

RED: 10 X



Nasjonalbiblioteket

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 22

LØGTINGS-TIDINDI

1993

Løgtingstíðindi 1993

Løgtingstíðindi

1993

Løgtingsmál

Tórshavn 1995

Løgtingstíðindi 1993
© Føroya Løgting
Fyriskipað av løgtingsskrivstovuni
Ábyrgd: Kristoffur Thomassen

Løgtingstíðindi
1993

Innihaldsyvirlit

Ólavsøkutingsetan 1993

Nr.

Ólavsøkutingsetan 1993 1
Løgmansrøðan á ólavsøku 1993 3
Farloyvi 21
Tingnevndir 24
Onnur tingseta 1993 26
Farloyvi 27
Tingnevndir 27

1 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 29
2 Broyting í fyriskipan um ígildissetan fyri Føroyar av lóg um partafeløg 31
3 Fíggjarløgtingslóg 1994. 33
4 Løgtingslóg um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya 75
5 Leiting eftir olju og jarðgassi á føroyskum øki. 82
6 Avtøka av løgtingslóg um orkuráð og orkugrunn. 83
7 Broyting í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka. 85
8 Forðan fyri monopolisering av høvuðsvinnuni. 86
9 Tilráðing um búskaparliga nevnd. 87
10 Broytingar í rentulógini. 90
11 Landsstýrismál. 92
12 Dómarakanning, t.e. óheft kanning av politisku og umsitingarligu ábyrgdini í áttatiárunum. 92
13 Val av álitismonnum og nevndum. 93
14 Broyting í útvarpsgjaldsskipanini. 94
15 Løgtingslóg um lántøku til landskassan. 96
16 Avtala millum donsku stjórnina og Føroya Landsstýri um endurfígging og kapitalinnskot í bankarnar v.m. 107
17 Broytingarnar í løgtingslóg um minstuløn, dagsstudning og minstaforvinning. 109
18 Broytingar í løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan. 118
19 Løgtingslóg um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald. (P-tal) 122
20 Broyting í løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum. 142
21 Broyting í arvagjaldinum. 145
22 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan. 147
23 Løgtingslóg um avmarking av hækkingum í lønum v.m. 150
24 Løgtingslóg um leinging av ávísum lønarsáttmálum og avtalum. 154
25 Løgtingslóg um prissteðg. 157
26 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 161
27 Løgtingslóg um áseting av kommunuskattaprosenti og um kommunalan kreppuláns- og veðhaldsgrunn v.m. 180
28 Veðhald fyri lánum til Húsagrunnin. 192

29 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan. 194
30 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 196
31 Uppskot til samtyktar um áheitan til forsætismálaráðharran um kanning av teim føroysku bankunum. 201
32 Íløgustuðul til at roykja fisk og samráðingar við EF um at hækka loftið á fiski úr Føroyum og kanna møguleikarnar fyri eini tollunión. 203
33 Løgtingslóg um lønarhæddaravgjald. 206
34 Broytingar viðvíkjandi vali av nevndini í ymsum lógum. 220
35 Loyvi til Húsalánsgrunnin, Menningargrunnin og Ídnaðargrunnin at rentunullstilla útlán og gera neyðsemjur (akkordir). 229
36 Kanning av samanleggingini av Sjóvinnubankanum og Føroya Banka. 231
37 Ígildissetan fyri Føroyar av sáttmála um vanligu vápnaðu herliðini í Europa og lóg um eftirlit við vanligu vápnaðu herliðinum í Danmark. 235
38 Ígildissetan fyri Føroyar av útlendingalógini. 237
39 Fyriskipan um ávís tiltøk móti Irak. 240
40 Forboð móti handli við Irak. 242
41 Ratifikatión av "De Forenede Nationers Rammekonvention om Klimaændringer". 244
42 Løgtingslóg um brenni- og samskiftisstudning til ávísar pensjónistar v.fl. 246
43 Ratifikatión av "Konvention om den biologiske mangfoldighed (biodiversitetskonventionen)". 249
44 Ígildissetan fyri Føroyar av lóg um broytingar í lóg um skipatrygdeikan og uppskot um kgl. fyriskipan, sum setir í gildi broytingar í lóg um skipatryggleikan. 250
45 Viðvíkjandi broyting í kunngerð um innflutning av djórum og smittuberandi lutum. 252
46 Skattafrítøka viðvíkjandi krígspensjón og frítøka fyri skerjing av grundupphæddini í fólkapensjón, um pensjónisturin fær krígspensjón. . . . 253
47- Grannskoðan av almennum roknskapum.
1 Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna og Ráfiskagrunnurin. 255
2 Sjúkrahúsverk Føroya, Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar sjúkrahús og Suðuroyar sjúkrahús. 271
3 Húsalánsgrunnurin. 277
4 Menningargrunnur Ídnaðarins 1992. 283
5 Føroya Ídnaðargrunnur 1992. 288
6 Apoteksverk Føroya 1992. 291
7 Sjónvarp Føroya 1992. 296
8 Útvarp Føroya 1992. 299
9 Føroya Jarðarráð 1992. 303
10 Vakstrarhúsgrunnurin 1992. 306
11 Strandfaraskip Landsins 1992. 307
12 Telefonverk Føroya Løgtings 1992. 313
13 Postverk Føroya 1992. 317
14 Íleggingargrunnurin fyri Føroyar 1992. 321
15 Landsskassin 1989-91. 326
48 Úrgildissetan av "Lov for Færøerne om bekæmpelse af kønssygdomme". . . 356
49 Løgtingslóg um serliga viðbót til langfarafiskimenn. 357

50 Ígildissetan fyri Føroyar av "Lov om ændring af forskellige love for Færøerne om sociale ydelser". 361
51 Løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap. 363
52 Viðvíkjandi nevndarvali í P/f Føroya Banka. 449
53 Broyting í løgtingslóg um toll. 451
54 Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald. 453
55 Regulering av fiskiskapinum á NAFO-økinum í 1994. 458
56 Skipan millum Føroyar og Litavia um sínámillum fiskirættindi í 1994. 460
57 Samráðingar við EF um treytir fyri limaskapi. 461
58 Betran av kappingartørinum. 468
59 Skipan millum Føroyar og Letland um sínámillum fiskirættindi í 1994. 470
60 Skipan millum Føroyar og Estland um sínámillum fiskirættindi í 1994. 472
61 Skipan millum Føroyar og Rusland um sínámillum fiskirættindi í 1994. 476
62 Eykatíggjarlóg 1993. 478
63 Avtøka av løgtingslóg um rentuskatt og løgtingslóg um rentuavgjald og tíggjarognaravgjald. 503
64 Broyting í løgtingslóg um rentuskatt. 506
65 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 509
66 Ígildissetan fyri Føroyar av "lov om Industriministeriets Erhvervsankenævn". 523
67 Skipan millum Føroyar og ES um sínámillum fiskirættindi í 1994. 524
68 Ígildissetan fyri Føroyar av "Anordning om ændring af anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse selskabers aflæggelse af årsregnskab m.v." 526
69 Tryggingarlóggávan. 527
70 Broytingar í tryggingaravtalulógini. 529
71 Regulering av veiðuni av laksi í 1994 sambært viðtøkunum í Norðuratlantisku Laksakonventiónini (NASCO). 530
72 Broyting í løgtingslóg um keyp av helikoptara. 532
73 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum v.m. 536
74 Upploysing av Tíggingargrunninum av 1992 og Uppsøgn av Richard Mikkelsen. 542
75 Skuldaravskriving av sethúsum í bankunum, søla av partapeningunum í føroysku bankunum og fyribyrging av monopolbanka. 544
76 Løgtingið ger kanningarferð til oynna Mann (Isle of Man). 549
77 Avtøka av MVG-gjaldinum á arbeiðsløn 555
78 Endurreisn av búskapinum, lækking av skattatrýsti, umlegging til bruttoskatt og lækking av kostnaðarstøðinum. 557
79 Skipan um loyvi at binda upp í samstarvsavtalur millum vinnufyritøkur úr Føroyum og Ruslandi/Baltisku londunum eykakvotur av svartkjafti í føroyskum sjógvi. 568
80 Ígildissetan fyri Føroyar av Baselsáttmálanum um eftirlit við flutningi av vandamiklum burturkasti um landamark. 569
81 Broyting í løgtingslóg um striking av skuld hjá Interkommunala Renovatiónsfelagsskapinum. 572
82 Skattafrí heiðursgáva. 574
83 Broyting í løgtingslóg um húsalánsgrunn. 575
84 Frásøla av flakavirkjunum hjá p/f Føroya Fiskavirking til sunna kapping hvørt við annað. 577
85 Løgtingslóg um landsins almennu roknskaparhald v.m. (162/92). 581

86 Samskifti landsstýrisins við peningastovnar og ábyrgd landsstýrisins at lætta um trongstøðu hjá húsarhaldunum. 585
87 Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald. 587
88 Íløgustuðul til alivinnuna. 589
89 Góðkenning av Montreal-sáttmálanum og uppiskoytisfrumskjøl til sáttmálan. 592
90 Broyting í løgtingslóg um minstuløn, dagsstudning og minstaforvinning. . . . 593
91 Løgtingsviðgerð av stýrisskipan og av bygnað til landsfyrisiting, áðrenn forstjóri verður settur. 596
92 Teksting av føroyskum SvF-sendingum fyri deyv. 598
93 Minstaløn til útróðrarmenn. 600
94 Broyting í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna. 603
95 Broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m. . . . 605
96 Veiðiloyvi bert at galda hukaveiðu. 606
97 Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn. 608
98 Løgtingslóg um minstuløn til útróðrarmenn. 609
99 Broyting í løgtingslóg um ferðagjald. 614
100 Fyrispurningar. 938
101 Øktir innløkumøguleikar hjá sethúsaeigarum frá ferðavinnuni. 616
102 Ígildissetan fyri Føroyar av lóg "om erhvervsfremme". 619
103 Løgtingslóg um tinglýsingargjøld. 621
104 Umlegging av allari kommunuskuld. 624
105 Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1994. 626
106 Avtøka av oljugjaldinum. 628
107 Styting av viðgerðartíðini hjá kærunevndini í almannamálum. 629
108 Samráðingar um tollsamgongu. 631
109 Lívstrygging til øll. 633
110 Samráðingar við donsku stjórnina. 635
111 Tilráðingar frá Tingmannaráði Útnorðurs 637
112 Broyting í sáttmála um norrøna mentannargrunnin. 639
113 Skipan Føroyar og Ísland millum um sínámillum fiskirættindi í 1994. 640
114 Samráðing við ríkisstjórnina um lutvísa avskriving av almennu skuld Føroya og realistiska aftargjaldsskipan av restskuldini. 641
115 Tilráðing frá Tingmannaráð Útnorðurs. 644
116 Løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu. . . . 645
117 Broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings. 647
118 Nýggj fólkatrygging. 648
119 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum v.m. 655
120 Skeljaveiðan hjá "Ólavi Hvíta" á innaru leiðunum norðanfyri og heimild. . . 658
121 Lóg um etiskt ráð fyri biomedisinska gransking. 659
122 Løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn (131/92). 661
123 Ungdómsarbeiði við fomminnum til ferðavinnuna. 663
124 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 666
125 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 670
126 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 673
127 Ígildissetan í Føroyum av lóg nr. 266 frá 22. mai 1986 um vaktarvirksemi. 674
128 Veðhald fyri láni til Arbeiðsloysistryggingina og Arbeiðsávísingina. 676
129 Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn. 686

130 Yvirtøka av lánunum í Húsalánsgrunninum soleiðis, at grunnurin kann viðgera setbúsalánini við støði í gjaldsmøguleikum hins einstaka. 688
131 Broyting í løgtingslóg um rentustudning til samansparing til húsabygging. 693
132 Broyting í "Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde". 696
133 Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing. 697
134 Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing. 705
135 Vernd móti uppsøgn orsakað av felagslimaskapi. 707
136 Reglur fyri fosturdiagnostikki. 709
137 Sjálvboðin uppsparing við skattafrádrátti. 712
138 Oljuboringar í Lopra. 715
139 Frískúlar og privatir grundskúlar. 717
140 Frígering í úrtíð av kapitaluppsparing til trongstødd. 722
141 Broyting í norðurlendskum sáttmála um starvsútinnan hjá ávísum starvsfólkabólkum innan heilsuverkið og djóralæknaverkið. 724
142 Broytingar í revsilógini. 725
143 Ígildissetan fyri Føroyar av "Nordisk Konvention om Social Sikring". 728
144 Løgtingslóg um ættleiðingarstuðul. 731
145 Løgtingslóg um dagpening vegna ættleiðing. 735
146 Ígildissetan fyri Føroyar av "Bekendtgørelse af aftale af 9. december 1988 med Finland, Island, Norge og Sverige om den retlige stilling for fællesnordiske institutioner og deres ansatte." 739
147 Ígildissetan fyri Føroyar av "Bekendtgørelse af overenskomst af 18. december 1983 med Finland, Norge og Sverige om samordning af pensionsrettigheder ifølge statslige pensionsordninger" og "Bekendtgørelse af protokol af 28. juni 1990 med Finland, Norge og Sverige om ændring af nordisk pensionsoverenskomst af 18. december 1973" 740
148 Ígildissetan fyri Føroyar av broytingum í lóg um radiosamskifti. 742
149 Umskipan av Føroya Lívstrygging til partafelag. 744
150 Løgtingslóg um fløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir. 750
151 Frádráttur í sjálvuppgávuni fyri gávur til vælgerandi endamál, umvælingar av sethúsum v.m. 755
152 Stovnsetan av toll- og avgjaldsfríum havnum, vørugoymsium og framleiðsluøkjum. 757
153 Skattafrádráttur fyri fiski- og útróðrarmenn. 759
154 Skattafrádráttur fyri rentur til sethúsalán v.m. 760
155 Løgtingslóg um keyp av ognini matr. nr. 1340c, Tórshavn 762
156 Løgtingslóg um lántøku til landskassan. 764
157 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 765
158 Broyting í løgtingslóg um rentuskatt. 770
159 Broyting í løgtingslóg um ferðagjald. 771
160 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum. 775
161 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 777
162 Óbroytt ferðagjøld við Strandferðsluni. 779
163 Figgingargrunnur fyri alivinnuna. 783
164 Avtøka av mvg (meirvirðisgjald) á neyðsynjarvørum. 784
165 Broytingar í forsorgarlógini. 786
166 Avtøka av MVG (meirvirðisgjaldi) á sjómansheimum og hotellum/matstovum, sum ikki hava skeinkiloyvi. 789

167 Løgtingslóg um minstuløn til útróðrarmenn. 791
168 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 794
169 Broyting í ferðslulógini. 796
170 Broytingar í meirvirðisgjaldsskipanini. 798
171 Løgtingslóg um fiskavraking. 800
172 Broyting í løgtingslóg um serligt avgjald á brennioliu. 805
173 Løgtingslóg um ábyrgdargrunn. 808
174 Løgtingslóg um stuðul til menning av fiskivinnu á landi. 811
175 Løgtingslóg um partapening í framtaksfelag. 815
176 Góðkenning av ESPOO-sáttmálanum um meting av áriinum á umhvørvið yvirum landamørk. 819
177 Løgtingslóg um húskaparráð. 821
178 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 824
179 Sethúsaskuldin. 827
180 Javnbjóðis skatting av hjúnum og støkum. 829
181 Trygging av realienini og av útgoldnu lønini. 831
182 Um loysn av trupuileikunum hjá Arbeiðsloysisskipanini. 835
183 Trygdarpeningur fyri avreiðing. 837
184 Broytingar í kommunulógini. 838
185 Nýggir vinnumøguleikar. 845
186 Broytingar í arbeiðsloysisskipanini. 847
187 Familjumál. 849
188 Viðvíkjandi nýtslu av senditíð hjá Útvarpi Føroya. 850
189 Løgtingslóg um keyp av ognini matr. nr. 1aæ, Hoyvik. 852
190 Løgtingslóg um stýrisskipan Føroya. 856
191 Broyting í lóg "om jordbrugets fremme". 886
192 Løgtingslóg um ískoytisstuðul til forsorgarstuðul vegna tørvandi arbeiði. 889
193 Áheitan frá ákæruvaldinum sambært § 728a í rættargangslógini. 893
194 Grannskoðan av almennum roknskapum - løgtingslóg um løgtingsgrannskoðararnar. 896
195 Grannskoðan av almennum roknskapum - løgtingslóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum v.m. 897
196 Grannskoðan av almennum roknskapum - reglugerð um val og virki løgtingsgrannskoðaranna. 897
197 Ígildissetan fyri Føroyar av "Lov om sociale ydelser på Færøerne". 897
198 Broyting í løgtingslóg um tær kommunalu fíggjarætlanirnar, áseting av kommunuskattaprosentinum, kommunalan kreppulánsgrunn o.a.m. 899
199 Broyting í løgtingslóg um minstuløn, dagsstudning og minstaforvinning 907
200 Broyting í løgtingslógunum um almennar og privatar skráir. 912
201 Ognan av føstum eigindómi. 915
202 Útskriving av nývali. 917
203 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávising. 921
204 Samráðingar við donsku stjórnina. 921
205 Áseting av skatti til landskassan. 921
206 Viðvíkjandi støðu teirra arbeiðsleysu. 921

Onnur tingseta 1993

207 Løgtingslóg um stýrisskipan Føroya (190/93). 922

100-

Fyrispurningar 1993

1 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðvíkjandi trygdargrunninum fyri avreiðingar og lønir. (Jógvan I. Olsen) 938

2 Fyrispurningur til Maritu Petersen, løgmann, viðvíkjandi embætismannahjálp úr Danmark. (Niels Pauli Danielsen) 939

3 Fyrispurningur til Maritu Petersen, løgmann, viðvíkjandi áheitan á landsstýrið um at fáa lista yvir kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir, sum landsstýrið o.fl. fylgja. (Hergeir Nielsen). 941

4 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðvíkjandi viðurskiftunum hjá menningartarnaðum í Vágum. (S.A.Ellefsen) 943

5 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðvíkjandi ásetan av hungursmarki. (Tordur J. Niclasen) 947

6 Fyrispurningur til Signar á Brúnni, landsstýrismann, viðv. út- og umbygging av Vogvallarfarstøðini. (S.A.Ellefsen) 954

7 Fyrispurningur til Maritu Petersen, løgmann, viðvíkjandi setan av "forstjóra" í Tinganesi. (Óli Breckmann). 956

8 Fyrispurningur til Bergur Jacobsen, landsstýrismann, um at fremja lógarbroyting innan landbúnaðin. (Anfinn Kallsberg) 958

9 Fyrispurningur til Finnboga Ísakson og Tummas Arabo, landsstýrismenn, viðv. niðurskrivingini av skuldini hjá veiðiflotanum. (Hans Tausen Olsen) 961

10 Fyrispurningur til Thomas Arabo, landsstýrismann, um framtíðarmøguleikar fyri aling á Sørvágsfirði. (S.A.Ellefsen) 964

11 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðv. virkseminum hjá kærunevndini í almannamálum. (Niels P. Danielsen/Leivur í Buð). 965

12 Fyrispurningur til Thomas Arabo, landsstýrismann, viðv. skeljaveiðu á innaru leiðunum norðanfyri og heimild. (N.P.Danielsen) 966

13 Fyrispurningur til Signar á Brúnni, landsstýrismann, viðvíkjandi príshækkingini á ferða- og flutningsgjaldi við Strandfaraskipum Landsins. (Niels Pauli Danielsen) 967

14 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðv. kærum í almannamálum. (Niels Pauli Danielsen) 969

15 Fyrispurningur til Berg Jacobsen, landsstýrismann, viðv. loyvi til nærvarp í Føroyum. (Tordur J. Niclasen) 973

16 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðv. heilsu- og sjúkrarøktarleiðsluni innan Heilsuverk Føroya. (Tordur J. Niclasen) 974

17 Fyrispurningur til Maritu Petersen, løgmann, viðv. setan av løgtingsins umboðsmanni. (Tordur J. Niclasen) 977

18 Fyrispurningur til Maritu Petersen, løgmann, viðv. sparingum og bygnaðarbroytingum í avtaluni frá 12. oktober 1993 á heilsu-, skúla-, almanna- og samskiftisøkinum. (Niels Pauli Danielsen) 978

19 Fyrispurningur til Maritu Petersen, løgmann, viðv. skrásetingareftirlitinum, p-talinum v.m. (Niels Pauli Danielsen) 979

20 Fyrispurningur til Finnboga Ísakson viðv. uttanlandsskuldini. (Niels Pauli Danielsen). 981

EVNISYVIRLIT
1993

Nr.		Bls.
	Almannamál	
42	Løgtingslóg um brenni- og samskiftisstudning til ávísar pensjónistar v.fl.	246
50	Ígildissetan fyri Føroyar av "Lov om ændring af forskellige love for Færøerne om sociale ydelser"	361
107	Stytting av viðgerðartíðini hjá kærunevndini í almannamálum.	629
143	Ígildissetan fyri Føroyar av "Nordisk Konvention om Social Sikring".	728
147	Ígildissetan fyri Føroyar av "Bekendtgørelse af overenskomst af 18. december 1983 med Finland, Norge og Sverige om samordning af pensionsrettigheder ifølge statslige pensionsordninger" og "Bekendtgørelse af protokol af 28. juni 1990 med Finland, Norge og Sverige om ændring af nordisk pensionsoverenskomst af 18. december 1973"	740
165	Broytingar í forsorgarlógini.	786
197	Ígildissetan fyri Føroyar av "Lov om sociale ydelser på Færøerne".	897
	Arbeiðsviðurskifti	
23	Løgtingslóg um avmarking av hækkingum í lønum v.m.	150
24	Løgtingslóg um leinging av ávísum lønarsáttmálum og avtalum.	154
97	Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.	608
122	Løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn (131/92).	661
123	Ungdómsarbeiði við fyrimunum til ferðavinnuna.	663
129	Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.	686
133	Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.	697
134	Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.	705
135	Vernd móti uppsøgn orsakað av felagslimaskapi.	707
146	Ígildissetan fyri Føroyar av "Bekendtgørelse af aftale af 9. december 1988 med Finland, Island, Norge og Sverige om den retlige stilling for fællesnordiske institutioner og deres ansatte."	739
181	Trygging av realløni og av útgoldnu løni.	831
182	Um loysn av trupulleikunum hjá Arbeiðsloysisskipanini.	835
186	Broytingar í arbeiðsloysisskipanini.	847
192	Løgtingslóg um ískoytisstuðul til forsorgarstuðul vegna tørvandi arbeiði.	889
203	Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.	921
206	Viðvíkjandi støðu teirra arbeiðsleysu.	921

Fiskivinnumál

17 Broytingarnar í løgtingslóg um minstuløn, dagsstudning og minstaforvinning. 109
18 Broytingar í løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan. 118
49 Løgtingslóg um serliga viðbót til langfarafiskimenn. 357
51 Løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap. 363
55 Regulering av fiskiskapinum á NAFO-økinum í 1994. 458
56 Skipan millum Føroyar og Litavia um sínámillum fiskirættindi í 1994. 460
59 Skipan millum Føroyar og Letland um sínámillum fiskirættindi í 1994. 470
60 Skipan millum Føroyar og Estland um sínámillum fiskirættindi í 1994. 472
61 Skipan millum Føroyar og Rusland um sínámillum fiskirættindi í 1994. 476
67 Skipan millum Føroyar og ES um sínámillum fiskirættindi í 1994. 524
71 Regulering av veiðuni av laksi í 1994 sambært viðtøkunum í Norðuratlantisku Laksakonventiónini (NASCO). 530
90 Broyting í løgtingslóg um minstuløn, dagsstudning og minstaforvinning. 593
93 Minstaløn til útróðrarmenn. 600
96 Veiðiloyvi bert at galda búkaveiðu. 606
98 Løgtingslóg um minstuløn til útróðrarmenn. 609
105 Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1994. 626
113 Skipan Føroyar og Ísland millum um sínámillum fiskirættindi í 1994. 640
120 Skeljaveiðan hjá "Ólavi Hvíta" á innaru leiðunum norðanfyri og heimild. . . 658
167 Løgtingslóg um minstuløn til útróðrarmenn. 791
199 Broyting í løgtingslóg um minstuløn, dagsstudning og minstaforvinning 907

Fíggjarmál

3 Fíggjarløgtingslóg 1994. 33
10 Broytingar í rentulógini. 90
16 Avtala millum donsku stjórnina og Føroya Landsstýri um endurfígging og
62 Eykafíggjarlóg 1993. 478
78 Endurreisn av búskapinum, lækking av skattatrýsti, umlegging til bruttoskatt og lækking av kostnaðarstøðinum. 557
99 Broyting í løgtingslóg um ferðagjald. 614
101 Øktir inntøkumøguleikar hjá sethúsacigarum frá ferðavinnuni. 616
106 Avtøka av oljugjaldinum. 628
130 Yvirtøka av lánunum í Húsalánsgrunninum soleiðis, at grunnurin kann viðgera sethúsalánini við støði í gjaldsmøguleikum hins einstaka. 688
131 Broyting í løgtingslóg um rentustudning til samansparing til húsabygging. 693
140 Frígering í úrtíð av kapitaluppsparing til trongstødd. 722

Grannskoðanarmál

47-1 Lønjavningargrunnur Skipstiskimanna og Ráfiskagrunnurin. 255
47-2 Sjúkrahúsverk Føroya, Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar sjúkrahús og Suðuroyar sjúkrahús. 271
47-3 Húsalánsgrunnurin. 277
47-4 Menningargrunnur Ídnaðarins 1992. 283

47-5 Føroya Idnaðargrunnur 1992. 288
47-6 Apoteksverk Føroya 1992. 291
47-7 Sjónvarp Føroya 1992. 296
47-8 Útvarp Føroya 1992. 299
47-9 Føroya Jarðarráð 1992. 303
47-10 Vakstrarhúsgrunnurin 1992. 306
47-11 Strandfaraskip Landsins 1992. 307
47-12 Telefonverk Føroya Løgtings 1992. 313
47-13 Postverk Føroya 1992. 317
47-14 Fleggingargrunnurin fyri Føroyar 1992. 321
47-15 Landsskassin 1989-91. 326
194 Grannskoðan av almennum roknskapum - løgtingslóg um løgtingsgrannskoðararnar. 896
195 Grannskoðan av almennum roknskapum - løgtingslóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum v.m. 897
196 Grannskoðan av almennum roknskapum - reglugerð um val og virki løgtingsgrannskoðaranna. 897

Heilsumál

48 Úrgildissetan av "Lov for Færøerne om bekæmpelse af kønssygdomme". . . 356
121 Lóg um etiskt ráð fyri biomedisinska gransking. 659
136 Reglur fyri fosturdiagnostikki. 709
141 Broyting í norðurlendskum sáttmála um starvsútinnan hjá ávísum starvsfólkabólkum innan heilsuverkið og djóralæknaverkið. 724

Kommunalmál

27 Løgtingslóg um ásetan av kommunuskattaprosenti og um kommunalan kreppuláns- og veðhaldsgrunn v.m. 180
104 Uttlegging av allari kommunuskuld. 624
184 Broytingar í kommunulógini. 838
198 Broyting í løgtingslóg um tær kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentinum, kommunalan kreppulánsgrunn o.a.m. 899

Landbúnaður

191 Broyting í lóg "om jordbrugets fremme". 886

Landsstýrismál

11 Landsstýrismál. 92
95 Broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m. . . . 605
110 Samráðingar við donsku stjórnina. 635
Føroya og realistiska afturgjaldsskipan av restskuldini. 641
111 Tilráðingar frá Tingmannaráði Útnorðurs 637
114 Samráðing við ríkisstjórnina um lutvísa avskriving av almennu skuld
115 Tilráðing frá Tingmannaráð Útnorðurs. 644
190 Løgtingslóg um stýrisskipan Føroya. 856

Lán- og lániábyrgdir

15 Løgtingslóg um lántøku til landskassan. 96
28 Veðhald fyri lánum til Húsagrunnin. 192
116 Løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu. . . . 645
128 Veðhald fyri láni til Arbeiðsloysistryggingina og Arbeiðsávísingina. 676
156 Løgtingslóg um lántøku til landskassan. 764

Lógarmál

2 Broyting í fyriskipan um fgildissetan fyri Føroyar av lóg um partafeløg 31
4 Løgtingslóg um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya 75
6 Avtøka av løgtingslóg um orkuráð og orkugrunn. 83
7 Broyting í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka. 85
12 Dómarakanning, t.e. óheft kanning av politisku og umsitingarligu ábyrgdini í áttatiárunum. 92
20 Broyting í løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum. 142
25 Løgtingslóg um prístreð. 157
31 Uppskot til samtyktar um áheitan til forsætismálaráðharran um kanning av teim føroysku bankunum. 201
34 Broytingar viðvíkjandi vali av nevndum í ymsum lógum. 220
35 Loyvi til Húsalánsgrunnin, Menningargrunnin og Íðnaðargrunnin at rentumullstilla útlán og gera nevðsemjur (akkordir). 229
36 Kanning av samanleggingini av Sjóvinnubankanum og Føroya Banka. 231
39 Fyriskipan um ávís tiltøk móti Irak. 240
40 Forboð móti handli við Irak. 242
45 Viðvíkjandi broyting í kunngerð um innflutning av djórum og smittuberandi lutum. 252
52 Viðvíkjandi nevndarvali í P/f Føroya Banka. 449
69 Tryggingarlóggávan. 527
70 Broytingar í tryggingaravtalulógini. 529
72 Broyting í løgtingslóg um keyp av helikoptara. 532
73 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum v.m. 536
74 Upploysing av Fíggingargrunninum av 1992 og Uppsøgn av Richard Mikkelsen. 542
75 Skuldaravskriving av sethúsum í bankunum, søla av partapeninginum í føroysku bankunum og fyribyrging av monopolbanka. 544
81 Broyting í løgtingslóg um striking av skuld hjá Interkommunala Renovatiónsfelagsskapinum. 572
83 Broyting í løgtingslóg um húsalánsgrunn. 575
87 Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald. 587
86 Samskifti landsstýrisins við peningastovnar og ábyrgd landsstýrisins at lætta um trongstøðu hjá húsarhaldunum. 585
91 Løgtingsviðgerð av stýrisskipan og av bygnað til landsfyrisiting, áðrenn forstjóri verður settur. 596
103 Løgtingslóg um tinglýsingargjøld. 621
109 Lívstrygging til øll. 633
118 Nýggj fólkatrygging. 648

119 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum v.m. 655
127 Ígildissetan í Føroyum av lóg nr. 266 frá 22. mai 1986 um vaktarvirksemi. 674
132 Broyting í "Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde". 696
142 Broytingar í revsilógini. 725
144 Løgtingslóg um ættleiðingarstuðul. 731
145 Løgtingslóg um dagpening vegna ættleiðing. 735
148 Ígildissetan fyri Føroyar av broytingum í lóg um radiosamskifti. 742
149 Umskipan av Føroya Lívstrygging til partafelag. 744
150 Løgtingslóg um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir. 750
155 Løgtingslóg um keyp av ognini matr. nr. 1340e, Tórshavn 762
160 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum. 775
162 Óbroytt ferðagjøld við Strandferðsluni. 779
169 Broyting í ferðslulógini. 796
171 Løgtingslóg um fiskavraking. 800
177 Løgtingslóg um búskaparráð. 821
179 Sethúsaskuldin. 827
187 Familjumál. 849
189 Løgtingslóg um keyp av ognini matr. nr. 1aæ, Hoyvík. 852
193 Áheitan frá ákæruvaldinum sambært § 728a í rættargangslógini. 893
200 Broyting í løgtingslógunum um almennar og privatar skráir. 912
201 Ognan av føstum eigindómi. 915
202 Útskriving av nývali. 917
204 Samráðingar við donsku stjórnina. 921
207 Løgtingslóg um stýrisskipan Føroya (190/93). 922

Løgtingið

76 Løgtingið ger kanningarferð til oynna Mann (Isle of Man). 549
94 Broyting í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna. 603

Mentannarmál

112 Broyting í sáttmála um norrøna mentannargrunnin. 639

Nevndarval

13 Val av álitismonnum og nevndum. 93

Ríkismál

37 Ígildissetan fyri Føroyar av sáttmála um vanligu vápnaðu herliðini í Europa og lóg um eftirlit við vanligu vápnaðu herliðinum í Danmark. 235
38 Ígildissetan fyri Føroyar av útlendingalógini. 237
41 Ratifikatión av "De Forenede Nationers Rammekonvention om Klimaændringer". 244
43 Ratifikatión av "Konvention om den biologiske mangfoldighed (biodiversitetskonventionen)". 249

44 Ígildissetan fyri Føroyar av lóg um broytingar í lóg um skipatryggleikan og uppskot um kgl. fyriskipan. sum setir í gildi broytingar í lóg um skipatryggleikan. 250

Skattamál

1 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 29
19 Løgtingslóg um rentuavgjald og tíggjarognaravgjald. (P-tal) 122
21 Broyting í arvagjaldinum. 145
22 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan. 147
26 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 161
29 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan. 194
30 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 196
33 Løgtingslóg um lønarhæddaravgjald. 206
46 Skattafrítøka viðvíkjandi krígspensjón og frítøka fyri skerjing av grundupphæddini í fólkapensjón. um pensjónisturin fær krígspensjón. . . . 253
54 Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald. 453
63 Avtøka av løgtingslóg um rentuskatt og løgtingslóg um rentuavgjald og tíggjarognaravgjald. 503
64 Broyting í løgtingslóg um rentuskatt. 506
65 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 509
77 Avtøka av MVG-gjaldinum á arbeiðsløn 555
82 Skattafrí heiðursgáva. 574
87 Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald. 587
124 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 666
125 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 670
126 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 673
137 Sjálvboðin uppsparing við skattafrádrátti. 712
151 Frádráttur í sjálvuppgávuni fyri gávur til vælgerandi endamál, umvælingar av sethúsum v.m. 755
153 Skattafrádráttur fyri fiski- og útróðrarmenn. 759
154 Skattafrádráttur fyri rentur til sethúsalán v.m. 760
157 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 765
158 Broyting í løgtingslóg um rentuskatt. 770
159 Broyting í løgtingslóg um ferðagjald. 771
161 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 777
164 Avtøka av mvg (meirvirðisgjald) á neyðsynjarvørum. 784
166 Avtøka av MVG (meirvirðisgjaldi) á sjómansheimum og hotellum/maistovum, sum ikki hava skeinkiloyvi. 789
168 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 794
170 Broytingar í meirvirðisgjaldsskipanini. 798
172 Broyting í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju. 805
178 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 824
180 Javnbjóðils skatting av hjúnum og støkum. 829
205 Áseting av skatti til landskassan. 921

Skúlamál

139 Frískúlar og privatir grundskúlar. 717

Tollmál

53 Broyting í løgtingslóg um toll. 451
152 Stovnsetan av toll- og avgjaldsfrírum havnum, vørugoymslum og framleiðsluøkjum. 757

Umhvørvismál

80 Ígildissetan fyri Føroyar av Baselsáttmálanum um eftirlit við flutningi av vandamiklum burturkasti um landamark. 569
89 Góðkenning av Montreal-sáttmálanum og uppískoytisfrumskjøl til sáttmálan. 592
176 Góðkenning av ESPOO-sáttmálanum um meting av árininum á umhvørvið yvirum landamørk. 819

Útvarp og sjónvarp

14 Broyting í útvarpsgjaldsskipanini. 94
92 Teksting av føroyskum SvF-sendingum fyrí deyv. 598
188 Viðvíkjandi nýtslu av senditíð hjá Útvarpi Føroya. 850

Vinnumál

5 Leiting eftir olju og jarðgassi á føroyskum øki. 82
8 Forðan fyri monopolisering av høvuðsvinnuni. 86
9 Tilráðing um búskaparfliga nevnd. 87
32 Fløgustuðul til at roykja fisk og samráðingar við EF um at hækka loftið á fiski úr Føroyum og kanna møguleikarnar fyri eini tollunión. 203
57 Samráðingar við EF um treytir fyri limaskapi. 461
58 Betran av kappingarførinum. 468
66 Ígildissetan fyri Føroyar av "lov om Industriministeriets Erhvervsankenævn". 523
68 Ígildissetan fyri Føroyar av "Anordning om ændring af anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse selskabers aflæggelse af årsregnskab m.v." 526
79 Skipan um loyvi at binda upp í samstarvsavtalur millum vinnufyritøkur úr Føroyum og Ruslandi/Baltisku londunum eykakvotur av svartkjafti í føroyskum sjógvi. 568
84 Frásøla av flakavirkjunum hjá p/f Føroya Fiskavirking til sunna kapping hvørt við annað. 577
88 Fløgustuðul til alivinnuna. 589
102 Ígildissetan fyri Føroyar av lóg "om erhvervsfremme". 619
108 Samráðingar um tollsamgongu. 631
117 Broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings. 647
138 Oljuboringar í Lopra. 715
163 Figgingargrunnur fyri alivinnuna. 783
173 Løgtingslóg um ábyrgdargrunn. 808
174 Løgtingslóg um stuðul til menning av fiskivinnu á landi. 811

175 Løgtingslóg um partapening í framtaksfelag. 815
183 Trygdarpeningur fyri avreiðing. 837
185 Nýggir vinnumøguleikar. 845

Fyrispurningar

100-1 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðvíkjandi trygdargrunninum fyri avreiðingar og lønir. (Jógvan I. Olsen) 938
100-2 Fyrispurningur til Maritu Petersen, løgmann, viðvíkjandi embætismannahjálp úr Danmark. (Niels Pauli Danielsen) 939
100-3 Fyrispurningur til Maritu Petersen, løgmann, viðvíkjandi áheitan á landsstýrið um at fáa lista yvir kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir, sum landsstýrið o.fl. fylgja. (Hergeir Nielsen). 941
100-4 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðvíkjandi viðurskiftunum hjá menningartarnaðum í Vágum. (S.A.Ellefsen) 943
100-5 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðvíkjandi ásetan av hungursmarki. (Tordur J. Niclasen) 947
100-6 Fyrispurningur til Signar á Brúnni, landsstýrismann, viðv. út- og umbygging av flogvallarfarstøðini. (S.A.Ellefsen) 954
100-7 Fyrispurningur til Maritu Petersen, løgmann, viðvíkjandi setan av "forstjóra" í Tinganesi. (Óli Breckmann). 956
100-8 Fyrispurningur til Bergur Jacobsen, landsstýrismann, um at fremja lógarbroyting innan lanóbúnaðin. (Anfinn Kallsberg) 958
100-9 Fyrispurningur til Finnboga Ísakson og Tummas Arabo, landsstýrismenn, viðv. niðurskrivingini av skuldini hjá veiðiflotanum. (Hans Tausen Olsen) 961
100-10 Fyrispurningur til Thomas Arabo, landsstýrismann, um framtíðarmøguleikar fyri aling á Sørvágsfirði. (S.A.Ellefsen) 964
100-11 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðv. virkseminum hjá kærunevndini í almannamálum. (Niels P. Danielsen/Leivur í Bø). 965
100-12 Fyrispurningur til Thomas Arabo, landsstýrismann, viðv. skeljaveiðu á innaru leiðunum norðanfyri og heimild. (N.P.Danielsen) 966
100-13 Fyrispurningur til Signar á Brúnni, landsstýrismann, viðvíkjandi príshækkingini á ferða- og flutningsgjaldi við Strandfaraskipum Landsins. (Niels Pauli Danielsen) 967
100-14 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðv. kærum í almannamálum. (Niels Pauli Danielsen) 969
100-15 Fyrispurningur til Berg Jacobsen, landsstýrismann, viðv. loyvi til nærvarp í Føroyum. (Tordur J. Niclasen) 973
100-16 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðv. heilsu- og sjúkrarøktarleiðsluni innan Heilsuverk Føroya. (Tordur J. Niclasen) 974
100-17 Fyrispurningur til Maritu Petersen, løgmann, viðv. setan av løgtingsins umboðsmanni. (Tordur J. Niclasen) 977
100-18 Fyrispurningur til Maritu Petersen, løgmann, viðv. sparingum og bygnaðarbroytingum í avtaluni frá 12. oktober 1993 á heilsu-, skúla-, almanna- og samskiftisøkinum. (Niels Pauli Danielsen) 978
100-19 Fyrispurningur til Maritu Petersen, løgmann, viðv. skrásetingareftirlitinum, p-talinum v.m. (Niels Pauli Danielsen) 979

100-20 Fyrispurningur til Finnboga Ísakson viðv. uttanlandsskuldini. (Niels Pauli Danielsen). 981

Nr.	Mál	Framlagt Dato	av	1. viðgerð	Nevnd	Álitið	2. viðgerð	3. viðgerð	atkvøðugreiðsla	Avgreitt	Løg nr
1	Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt	4-Aug	FL	4-Aug	Skattanevnd	4/8/93	4/8/93	4-Aug	24-0	20/8/93	158,5/8-93
2	Broyting í fyriskipan um fígildissetan fyri Føroyar av lóg um partafelag.	7/9/93	FI	14/9/93	Rættarnevnd						
3	Figgjarløgtingslóg 1994	31/8/93	FL	14/9/93	Figgjarnevnd	18/12/93	20/12/93	21/12/93	19-0	27/12/93	202,22/12-93
4	Løgtingslóg um lorkannингar o.a.m av undirgrund Føroya.	31/8/93	FL	8/9/93	Marknaðarnevnd	21/9/93	24/9/93	24/9/93	17-0	5/11/93	179,21/10-93
5	Leiting eftir olju og jarðgassi á føroyskum øki.	7/9/93	FL	8/9/93	Marknaðarnevnd	21/9/93	24/9/93		17-0	4/10/93	
6	Avtoka av løgtingslóg um orkuráð og orkugrunn.	14/9/93	FI	21/9/93	Iðnaðarnevnd	21/4/93	26/4/93 26-0	27/4/93	20-0	24/5/93	71,10/5-94
7	Broyting í løgtingslóg um innflutning og sølu av risdrekka	14/9/93	JL, ÓB,JKO, HH,NPD, TN	21/9/93	Rættarnevnd						
8	Forðan fyri monopolisering av høvuðsvinnuni.	14/9/93	Olaf Olsen	21/9/93	Rættarnevnd						
9	Tilráðing um búskaparliga nevnd	14/9/93	Olaf Olsen Lasse Klein	21/9/93	Rættarnevnd	9/11/93	16/11/93		nevnd11-0 Uppr. 11-0	10/12/93	
10	Broytingar í rentulógini.	24/9/93	FL	27/10/93	Skattanevnd		25/11/93		22-Jan	10/12/93	
11	Landsstýrismál		FI								
12	Dómarakenning t.e. óheft kanning av politisku og umsitingarligu ábyrgdini í áttatiárunum.	19. okt	KFPP	15/11/93	Rættarnevnd					8/8/93	
13	Val av álitsmonnum og nevndum										
14	Broyting í útvarpsgjaldsskipanini.	20. okt	T.Nielsen	3/11/93	Mentog skúlan.	8/4/94	12/4/94		9-0	20/4/94	
15	Løgtingslóg um lántøku til landskas	19 okt	FL	26/10/94	Figgjarnevnd	3/11/93	3/11/93	3/11/93	17-0	8/11/93	184,4/11-93
16	Avtala millum donsku stjórnina og Føroya landsstýri um endurfigging og kapitalinnskot í bankarnar v.m.	19. okt	FL	26/10/93	Figgjarnevnd	3/11/93	3/11/93		17-0	4/11/93	
17	Broytingar í løgtingslóg um minstuli dagsstuðning, og minstaforvinning v.m.	20.okt	FI.	28/10/93	Fiskivinnunevnd	25/3/94	7/4-12/4	15/4/94	17.-9	Burturlagd sí lm 199/93	

18	Broytingar í løgtingslóg um stuðul til fiskiskaillotan.	20.okt	FL	28/10/93	Fiskivinnunevnd	28/4-4/5	28/4-9/5 32-0	19/5/93	30-0	18/7/94	83,18/5-94
19	Løgtingslóg um rentuavgjald og tiggjarognaravgjald.	19.okt	FL	23/11/93	Skattanevnd	23/11/93	25/11/93 17,-11	2/12/93	17,-9	15/12/93	192,10/12-93
20	Broyting í løgtingslóg um evrisskrá hjá almennum myndugleikum.	20. okt	FL	2/11/93	Rættarnevnd	17/2/94	22/2-25/2	28/2/94	19-0	30/3/94	35,24/3-94
21	Broyting í arvaavgjaldinum	20.okt	FL	27/10/93	Skattanevnd						
22	Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.	20 okt	FL	27/10/93	Skattanevnd	23/11/93	25/11/93 17,-9	2/12/93	17,-7	15/12/93	196,10/12-93
23	Løgtingslóg um avmarking av hækkir um í lønum v.m	20.okt	FL	28/10/93	Arb málanevnd	3/11/93	16/11/93 17-0	25/11/93	17-0	10/12/93	190,8/12-93
24	Løgtingslóg um leinging av ávísum lønarsáttmálum og avtalum.	20.okt	F.	28/10/93	Arb málanevnd	3/11/93	16/11/93 afturtikið			2/3/94	
25	Løgtingslóg um prissteðg.		FL	28/10/93	Arb.málanevnd	3/11/93	16/11/93 17-0	23/11/93	17-0	10/12/93	191,8/12-93
26	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.	20.okt	FL	27/10/93	Skattanevnd	23/11/93	25/11/93 17-9,	2/12/93	17-8,	16/12/93	194,10/12-93
27	Løgtingslóg um áseting av kommunalt prosenti og um kommunalan kreppuláns- og veðhaldsgrunn v.m	20.okt	FL	29/10/93	Tiggjarnevnd	16/11/93	19/1123/11 19-0	25/11/93	27-0	10/12/93	189,8/12-93
28	Veðhald fyri lánum til Húsalánsgrunn	20 okt	FL	2/11/93	Tiggjarnevnd	19/11/93	23/11/93 27-0	25/11/93	24-0	10/12/93	188,6/12-93
29	Broyting í løgtinglóg um áseting av skatti til landskassan.	20.okt	FL	27/10/93	Skattanevnd	23/11/93	25/11/93 20-0	2/12/93	17-0	16/12/93	195,10/12-93
30	Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.	20.okt	FL	27/10/93	Skattanevnd		25/11/93 17-0	2/12/93	17-0	16/12/93	197,10/12-93
31	Uppskot til samtyktar um áheitan til forsætismálaráðharran um kanning av teim føroysku bankunum	20.okt	HDN	29/10/93	Rættarnevnd		23/11/93		17-0	25/11/93	
32	Tilgongustuðul at royndja fisk og samráðingar við EF um at hækka loftið og kanna møguleikarnar fyri eini toll-unión.	27.okt	KFPF	2/11/93	Idnaðarnevnd		26/4/94		I 10-0 II 8-0	16/5/94	
33	Løgtingslóg um lønarhæddaravgjald	20 okt	FL	27/10/93	Skattanevnd	23/11/93	25/11/93 17,-8	2/12/93	17-8,	16/12/93	193,10/12-93
34	Broytingar viðvíkjandi vali av nevnum í ymsum lógum.	27. okt	FL	2/11/93	Rættarnevnd						

35	Loyvi til Húsalánsgrunnin, Menningargrunnin og Íbúðargrunning at rentuumstilla útlán og gera neyðsemjur (Akkordir)	27. okt	KFFF	2/11/93	Figgjarnevnd	15/4/94	22/4/94		3-0	31/5/94		
36	Kanning av samanleggini av Sjóvinnubankanum og Føroya Banka.	27. okt	Fólkafl.	29/10/93	Rættarnevnd	19/11/93	23/11/93		16-0	10/12/93		
37	Ígildissátan fyri Føroyar av sáttmála vanligu vápnaðu herliðini í Evropa og lóg um ávirkir við vanligu vápnaðu herliðini í Danmark.	16. nov	FL	19/11/93	Rættarnevnd	15/2/94	17/2/94		26-0	2/3/94		
38	Ígildissetan fyri Føroyar av útlendingalógini	16. nov	FL	19/11/93	Rættarnevnd	15/2/94	17/2/94		26-0	2/3/94		
39	Fyrskipan um ávís tiltak mótvirki Irak.	16. nov	FL	19/11/93	Marknaðarnevnd	18/12/93	20/12/93		28-0	27/12/93		
40	Forboð mótvirki handli við Irak	16. nov	FL	19/11/93	Marknaðarnevnd	18/12/93	20/12/93	28/12/93	22-0	10/2/94	16,27/1-94	
41	Ratifikatión av "De Forenede Nationer Rammekonvention om Klimaændringer.	16. nov	FL	19/11/93	Umhvørvisnevnd	23/11/93	26/11-2/12	27-0	27-0	10/12/93		
42	Løgtingslóg um brenni-og samskiftistuðning til avlisar pensionistar v.fl.	16. nov	FL	19/11/93	Alm. og heilsun.	23/11/93	25/11/93 27-0	25/11/93	20-0	10/12/93	187,8/12-93	
43	Ratifikatión av "Konvention om den biologiske mangfoldighed (biodiversitetskonventioner)".	23 nov	FL	25/11/93	Umhvørvisnevnd	18/12/93	18/12/93		21-0	20/12/93		
44	Ígildissetan fyri Føroyar av lóg um broytingar í lóg um skipatrygdarlíka og uppskot um lógfyriskipan, sum sendir í gildi broytingar í lóg um skipatrygdarlíkan.	23 nov	FL	25/11/93	Fiskivinnunevnd	4/3/94	21/3/94		23-0	24/3/94		
45	Viðvíkjandi broyting í kunngerð um innflutning av djórum og smittuberandi lutum.	23 nov	T. Niclasen	25/11/93	Landbúnaðarnevnd							
46	Skattafrítøka viðvíkjandi krígspensjón og frítøka fyri skerjing av grundupphæddini í fólkapensjón, um pensionistur fær krígspensjón.	25. nov	Fólkafl.	2/12/93	Skattanevndin	27/4/94	28/4/94 aftur tiklað			16/5/94		
47 1	Granskoðan av almennum rokningum Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna og Ráðfiskagrunnurin.	18.feb	Løg.grannsk.				3/3/94		21-0	9/5/94		
2	Sjúkrahúsverk Føroya, Landssjúkra-	18.feb	Løg.grannsk	23/2/94		18/2/94	3/3-4/3		24-0			

	húsið, Klaksv. Sjúkrahús, Suð.sjúkrah.											
3	Húsalánsgrunnurin	18.feb	Løg.grannsk	22/2/94			3/3-4/3		22-0	24/3/94		
4	Menningargrunnur Iðnaðarins 1992	15. apr	Løg.grannsk	21/4/94			26/4/94		28-0	3/5/94		
5	Føroya Iðnaðargrunnur 1992	15. apr	Løg.grannsk	21/4/94			26/4/94		28-0	6/5/94		
6	Apoteksverk Føroya 1992	15. apr	Løg.grannsk	21/4/94			26/4/94		27-0	9/5/94		
7	Sjónvarp Føroya 1992	22. febr	Løg.grannsk	26/2/94			3/3-4/3		23-0			
8	Útvarp Føroya 1992			28/4/94			3/3-4/3		21-0	24/3/94		
9	Føroya Jarðarráð 1992	22. febr	Løg.grannsk	28/2/94			3/3-4/3		24-0	24/3/94		
10	Vakstrarhúsgrunnurin 1992	22. febr	Løg.grannsk	28/2/94			3/3-4/3		23-0	24/3/94		
11	Strandferaskip Landsins 1992	21. apr.	Løg.grannsk	26/4/94			27/4/94		25-0	6/5/94		
12	Telefonverk Føroya Løglings 1992	15 apr	Løg.grannsk	21/4/94			26/4/94		28-0	6/5/94		
13	Postverk Føroya 1992	15. apr	Løg.grannsk	21/4/94			26/4/94		28-0	9/5/94		
14	Ileggingargrunnurin fyrir Føroyar 92	15. apr	Løg.grannsk	21/4/94			26/4/94		28-0	9/5/94		
15	Landskassin 1989 - 1991	21. apr	Løg.grannsk	26/4/94	Grannskoð nevnd							
48	Úrgildissetan av "Lov for Færøerne o Bekæmpelse af kønssygdomme"	2. des	FL	28/12/93	Rættarnevnd	12/4/94	15/4/94		24-0	20/4/94		
49	Løgtingslóg um serliga viðbót til langfarafiskimenn	2. des	FL	28/12/93	Ftggjarnevnd	17/2/94	23/2/94 24-0	25/2/94	30-0	30/3/94	32,23/3-94	
50	Ígildissetan fyriFøroyar av "Lov óm ændring af forskellige love for Færøerne om sociale ydelser".	18. des	FL		Alm. og heilsun.	18/2/94	22/2/94		22-0	21/3/94		
51	Løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap	18. des	FL	21/12/93	Fiskivinnunevnd	23/2/94	25/2/94 17-0	4/3/94	17-05-2	7/4/94	28.10/3 94	
52	Viðvíkjandi nevndarvali í P/F Føroya Banka.	15. des	LK,SM,NPD XHJ,OB,JV HDN, FA	23/2/94	Rættarnevnd		25/2/94					
53	Broyting í løgtingslóg um toll	15. des	FL	28/12/93	Skattanevnd	26/4/94	27/4/94 17-0	28/4/94	17-0	23/5/94	60.10/5-94	
54	Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.	18. des	FL	28/12/93	Skattanevnd	21/4/94	26/4/94 27-0	28/4/94	26-0	31/5/94	61,25/5-94	
55	Regulering av fiskiskapinum á NAFO økinum.	18. des	FL	28/12/93	Marknaðarnevnd		21/3/94		24-0	24/3/94		

56	Skipan millum Føroyar og Litavia um sínamillum fiskirættindi í 1994	18. des	FL	28/12/93	Marknaðarnevnd	4/3/94	21/3/94		23-0	24/3/94		
57	Samráðingar við EF um treytir fyri flimaskapi	18. des	Samb.fl	18/1/94	Marknaðarnevnd	22/4/94	26/4-27/4		minni.6-0 semb.5-0	16/5/94		
58	Betran av kappingartørinum	18. des	Samb.fl.	20/1/94	Skattanevnd	12/4/94				8/6/94		
59	Skipan millum Føroyar og Letland um sínamillum fiskirættindi í 1994	18. des	FL	28/12/93	Marknaðarnevnd	4/3/94	21/3/94		24-0	24/3/94		
60	Skipan millum Føroyar og Estland um sínamillum fiskirættindi í 1994.	18. des	FL	28/12/93	Marknaðarnevnd	4/3/94	21/3/94		24-0	24/3/94		
61	Skipan millum Føroyar og Rusland um sínamillum fiskirættindi í 1994.	18 des	FL	28/12/93	Marknaðarnevnd	4/3/94	21/3/94		23-0	24/3/94		
62	Eykafiggjarlóg 1993.	18.des		18/1/94	Figgjarnevnd	17/2/94	23/2/94 18-0	25/2/94	21-0	24/3/94	29.4/3 94	
63	Avtøka av løgtingslóg um rentuskatt løgtingslóg um rentuavgjald og figgjar ognaravgjald.	18. des	FL	2/2/94	Skattanevnd	12/4/94	22/4/94		12-0	31/5/94		
64	Broyting í løgtingslóg um rentuskatt	21.des	FL	28/12/93	Skattanevnd	24/3/94	22/4/94	26/4/94	28-0	24/5/94	61,10/5-94	
65	Broyting í løgtingslóg um landsskat og kommunuskatt	21 des	FL	28/12/93	Skattanevnd	28/4/94	9/5/94	11/5/94	29-0	31/5/94	79,25/5-94	
66	Ígildissetan fyri Føroyar av "Lov om Industriministeriets Erhvervsankenævn	21. des	FL	28/12/93	Rættarnevnd	15/2/94	17/2/94		27-0	2/3/94		
67	Skipan millum Føroyar og EF um sínamillum fiskirættindi í 1994	28.des	FL	25/1/94	Marknaðarnevnd	24/3/94	7/4/94		23-0			
68	Ígildissetan fyriFøroyar av"Anordnin om aendring af anordning om ikraftbraedin for Færoerne af lov om visse selskabers aflæggelse af årsregnskab m.v."	28.des	FL	18/1/94	Rættarnevnd	27/4/94	28/4/94		27-0	9/6/94		
69	Tryggingarlóggávan	28.des	FL	25/1/94	Iðnaðarnevnd							
70	Broytingar í tryggingaravtalulógini.	28.des	FL	25/1/94	Iðnaðarnevnd							
71	Regulering av veiðuni av laksi í 1994 í samhævt viðtøkunum í Norðuratlantisku laksakonventiónini (NASCO)	28.des	FL	21/1/94	Marknaðarnevnd	17/2/94	22/2/94		23-0	7/4/94		
72	Broyting í løgtingslóg um keyp av helikoptara.	28.des	FL	18/1/94	Samferðslunevnd	22/2/94	25/2/94 17-0	25/2/94	17-0	30/3/94	36,24/3 94	

73	Broyting í løgtingslóg um skráseting argjald á motorakførum.	26. jan	Fólkatl.	2/2/94	Rættarnevnd	26/4/94	27/4/94 27-0		8-0 27-0	6/5/94	
74	Uppløysing av Figgingargrunninum av 1992 og uppsagn av Richard Michelsen		Fólkatl	17/2/94	Rættarnevnd	12/4/94	22/4/94		2-0 3-0	31/5/94	
75	Skuldaravskriving av samlaðum í bankunum, sala av partapeningi í føroysku bankunum og fyribyrging av monopolbanka.	18/1/94	Fólkatl.	15/2/94	Figgjarnevnd	16/3/94	22/3/94		8-0 15-0	30/3/94	
76	Løgtingið ger kanningarferð til oynna Man (Isle of Man)	18/1/94	Fólkatl.	2/2/94	Figgjarnevnd	22/3/94	17/2-24/3		5 0	30/3/94	
77	Avtøka av MVG-gjaldinum á arbeiðslønum.	20/1/94	Fólkatl	2/2/94	Skattanevnd	24/3/94	7/4/94		8-0		
78	Endurreisn av búskapinum, lækking av skattatrýstið, umlegging frá bruttoskatt og lækking av kostnaðarstøðinum	18/1/94	Fólkatl	17/2/94	Skattanevnd	12/4/94	22/4/94		5-0	13/5/94	
79	Skipan íms loyvi at binda upp í samstarvsavtalur millum vinnuvritøkur úr Føroyum og Rusland/Baltiskir londini eyka kvotur av svartkjafti í føroyskum sjógvi.	18/1/94	FL	21/1/94	Marknaðarnevnd	17/2/94	22/2/94		21-0	30/3/94	
80	Ígildissetan fyri Føroyar av baselsmálanum um eftirlit við flutningi av vandamiklum burturkasti um landamørk.	18/1/94	FL	25/1/94	Umhvørvisnevnd	26/1/94	1/2/94		22-0	10/2/94	
81	Broyting í løgtingslóg um striking av skuld hjá Interkommunala Renovationsfelagsskapinum	18/1/94	FL	20/1/94	Figgjarnevnd	17/2/94	22/2/94 22-0	25/2/94	27-0	30/3/94	37,24/3 94
82	Skattatrí heiðursgáva	18/1/94	KFFF	8/2/94	Skattanevnd	27/4/94	28/4/94		1-0	16/5/94	
83	Broyting í løglingslóg um húsalánsgrunn.	20.jan	FL	25/1/94	Figgjarnevnd	18/3/94	22/3/94 29-0	24/3/94	26-0	11/4/94	45 8/4-94
84	Frásala av Bakavirkjunum hjá P/F Føroya Fiskavirking til sunna kapping hvørt við annað.	20/1/94	SAE og JP.	26/1/94	Iðnaðarnevnd	26/4/94	27/4/94		12-0	16/5/94	
85	Í løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald v.m.	25/1/94			Figgjarnevnd	29/1/94	1/2/94 20-0	8/2/94	17-0	30/3/94	33,23/3-94
86	Samskifti landsstýrisins við peningstovnar og ábyrgd landsstýrisins at	20/1/94	T.Nielsen	26/1/94	Figgjarnevnd	18/3/94	22/3/94		15-0 8-0	30/3/94	

	lætta um tvongstøðu hjá húsarhaldinum											
87	Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.	28/1/94	Sambandtl.	26/1/94	Skattanevnd	21/4-22/4	25/4/94 málið altjóðkið				3/5/94	
88	Ílogustuðul lit alivinnuna.	25/1/94	FL	2/2/94	Idnaðarnevnd	4/5/94	26/4-9/5		13-14-5		16/5/94	
89	Góðkenning av montreal-sáttmálanum og uppfiskoytisfrumskjal til sáttmálan	25/1/94	FL	1/2/94	Rættarnevnd	12/4/94	15/4/94		27-0		20/4/94	
90	Broyting í løgtingslóg um minstulon, dagsstudning og minstalorvinning.	25/1/94	Fólkatl.	1/2/94	Fiskivinnunevnd	4/3/94	4/3/94		6-0		30/3/94	
91	Løgtingsvígsorð av stýrisskipanar og av bygnað til landsfyrisiting, áðrenn forstjóri verður settur.	2/2/94	Fólkatl.	15/2/94	Rættarnevnd	12/4/94	22/4/94		I 2-0 II 3-0		9/5/94	
92	Teksting av føroyskum SVF-sendingu	26/1/94	Fólkatl.	2/2/94	Mentl og skúlan.	12/4/94	12/4/94		13-0		20/4/94	
93	Minstalon lit útróðrarmenn.	25/1/94	KFFF	1/2/94	Fiskivinnunevnd		4/3/94		2-0		30/3/94	
94	Broyting í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna	25/1/94	T.Niclasen	8/2/94	Figgjarnevnd	17/5/94					8/6/94	
95	Broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirlon landsstýrismanna v.m.	1/2/94	T. Niclasen	8/2/94	Figgjarnevnd	17/5/94					8/6/94	
96	Veiðiloyvi bert at galda hókaveiðu	25/1/94	T.Niclasen	8/2/94	Fiskivinnunevnd	4/3/94	21/3/94		1-0		30/3/94	
97	Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.	26/1/94	T.Niclasen	1/2/94	Arb.mál.nevnd							
98	Løgtingslóg um minstulon til útróðrarmenn.	26/1/94	FL	1/2/94	Fiskivinnunevnd	4/3/94	4/3/94 27-0	4/3/94	27-0		7/4/94	39,24/3 94
99	Broyting í løgtingslóg um ferðagjald.		Fólkatl.	3/2/94	Idnaðarnevnd	26/4/94	26/4/94		11-0		16/5/94	
101	Oktir inntøkumeguleikar hjá sethúseigarum frá forðavinnuni.		Fólkatl.	22/2/94	Idnaðarnevnd	21/4/94	26/4/94		6-0		3/6/94	
102	Ígildissetan fyri Føroyar av lóg "om erhvervsfremme".	2/2/94	Samb.fl.	8/2/94	Idnaðarnevnd	21/4/94	26/4/94		25-0		9/5/94	
103	Løgtingslóg um tinglýsingargjald.	8/2/94	FL	17/2/94	Figgjarnevnd	27/4/94	28/4/94 18-0	28/4-9/5	17-5.		24/5/94	76,17/5-94
104	Umlegging av allari kommunuskuld.	17/2/94	KFFF	18/2/94	Figgjarnevnd	18/3/94	22/3/94		2-3.		30/3/94	
105	Skipan millum Føroyar og Noreg um sinamillum fiskirættindi í 1994.	8/2/94	FL	17/2/94	Macknaðarnevnd	4/3/94	21/3/94		23-0		24/3/94	

106	Avtoka av oljugjaldinum.	8/2/94	KFFF	17/2/94	Skattanevnd	27/4/94	28/4/94			1-0	16/5/94	
107	Styrking av viðgerðartíðini hjá kærunevndini í almannamálum.	8/2/94	KFFF	17/2/94	Alm. og heilsun.							
108	Samráðingar um tollsamgongu.	8/2/94	Fólkatl.	22/2/94	Marknaðarnevnd	24/3/94	7/4/94			8-0		
109	Livtrygging hl. ofl.	15/2-94	T.Niclasen	22/2/94	Iðnaðarnevnd	21/4/94	26/4/94			1-0	3/6/94	
110	Samráðingar við donsku stjórnina.	15/2/94	T. Niclasen	22/2/94	Figgjarnevnd	18/3/94	22/3/94		8-0	30/3/94		
111	Tilráðingar frá Tingmannaráðið Útnorðurs.	17/2/94	Tingm ráðið	22/2/94			28/2/94			26-0	24/3/94	
112	Broyting í sáttmála um norrœna mentunnargrunnin.	17/2/94	FL	22/2/94	Mentog skúlan	6/4/94	12/4/94			19-0	20/4/94	
113	Skipan Føroyar og Ísland millum um sinnamillum fiskirættindi í 1994.	17/2/94	FL	22/2/94	Marknaðarnevnd	4/3/94	21/3/94			24-0	24/3/94	
114	Samráðingar við ríkisstjórnina um lutvisa avskriving av almennu skuld Føroya og realistiska atlurgjaldsskipan av restskuldini.	15/2/94	ÓB	23/2-3/3	Figgjarnevnd	22/4/94	26/4/94			8-0	3/6/94	
115	Tilráðing frá Tingmannaráð Útnorður	17/2/94	Tingm.ráðið	22/2/94			28/2/94			26 0	24/3/94	
116	Løgtingslóg um ábyrgd fyri lanum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu.	17/2/94	FL	22/2/94	Figgjarnevnd	22/3/94	24/3/94 28-0	12/4/94		28-0	9/6/94	,.,50,3/5-94
117	Broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings	17/2/94	FL	22/2/94	Figg.arnevnd	18/3/94	22/3/94 28-0	24/3/94		26-0	11/4/94	46,8/4-94
118	Nýggj fólkatrygging.	17/2/94	Fólkfl	22/2/94	Iðnaðarnevnd		26/4/94			9-0	3/6/94	
119	Broyting í løgtingslóg um skráseting gjald av motorakførum v.m.	17/2/94	Fólkafl.	22/2/94	Skattanevnd		27/4/94			8-0	16/5/94	
120	Skeljavelða nja "Ólavi Hvíta" á innari leiðunum norðanfyri og heimild.	16/2/94	KFFF	3/3/94	Fiskivinnunevnd	27/4/94	28/4/94 aftur tikið				16/5/94	
121	Lóg um etiskt ráð fyri biomedisinska gransking.	25/2/94	KFFF	3/3/94	Rættarnevnd	12/4/94	22/4/94			19-0	9/5/94	
122	Løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn (lm.131/92)				Rættarnevnd	18/3/94	7/4/94 20-0	15/4/94		18-6-5-3	9/5/94	52,3/5-94
123	Ungdómsarbeiði við fornminnum til ferðavinnuna.	18/3/94	Fólkafl.	23/3/94	Figgjarnevnd	22/4/94	26/4/94			7-0	3/6/94	

124	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.	25/2/94	FL	3/3/94	Skattanevnd		26/4/94 28-0	27/4/94	27-0	20/5/94		24,10/5-94
125	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.	25/2/94	T.Niclasen	3/3/94	Skattanevnd	12/4/94	22/4/94		1-0	13/5/94		
126	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.	25/2/94	T.Niclasen	3/3/94	Rættarnevnd	12/4/94	22/4/94		5-0	31/5/94		
127	Ígildissetan fyri Føroyar av lóg nr. 266 frá 22. mai 1986 um vaktarvirksemi	25/2/94	FL	3/3/94	Rættarnevnd							
128	Veðhald fyri láni til Arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsavlisingina.	25/2/94	FL	28/2/94	Figgjarnevnd	4/3/94	4/3/94 17-0	4/3/94	17-0	24/3/94		23,4/3-94
129	Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.	25/2/94	FL	28/2/94	Figgjarnevnd	4/3/94	4/3/94 17-0	4/3/94	17-0	24/3/94		21,4/3-94
130	Yvirtøka av láninum í Húsáttargrunninum soleiðis, at grunnurin kann viðgera serhúsalánini við støði í gjaldsmøguleikum hins einstaka.	28/2/94	Bj.O	7/4/94	Figgjarnevnd	22/4/94	26/4/94	I 7-0 II 7-0	upr.uppsk 7-0	3/6/94		
131	Broyting í løgtingslóg um rentustuðning til samansparing til húsabygging.	4/3/94	FL	21/3/94	Figgjarnevnd	15/4/94	21/4/94 23-0	26/4/94	23-0	24/5/94		67 10/5-94
132	Broyting í "Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde".	4/3/94	FL	21/3/94	Alm.og heilsun.							
133	Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.	4/3/94	FL	21/3/94	Arb.málanevnd	23/3/94	7/4/94			19/8/94		
134	Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.	4/3/94	FL	4/3/94	Arb.málanevnd	4/3/94	4/3/94 17-0	4/3/94	17-0	24/3/94		22,4/3-94
135	Vernd móti uppsagn orsakað av felagsmaskapi.	4/3/94	ÓB.	23/3/94	Arb.málanevnd	22/4/94	26/4/94		5-0	16/5/94		
136	Reglur fyri fosturdiagnostikkr.	18/3/94	KFFF	23/3/94	Rættarnevnd	12/4/94	22/4/94		6-0	31/5/94		
137	Sjálvboðin uppsparing við skattalætti	18/3/94	ÓB	23/3/94	Skattanevnd	12/4/94	22/4/94		6-0	31/5/94		
138	Oljuboringar í Lopra	16 mars	KFFF	23/3/94	Idnaðarnevnd	21/4/94	26/4/94		3-0	31/5/94		
139	Friskúlar og privatir grundskúlar	18/3/94	Fólkafl.	23/3/94	Ment.og skúlan.	21/4/94	26/4/94		8-0	3/6/94		
140	Frigeving í úrtíð av kapitaluppsparing til trongstødd.	18/3/94	Fólkafl.	24/3/94	Skattanevnd	26/4/94	27/4/94		8-0	16/5/94		

141	...yting í norðurlendskum sáttmála ...r starvsútinnan hjá ávísum starvsfelkaboðkum innan heilsuverkið og djóratænaverkið.	18/3/94	FL	21/3/94	Rættarnevnd	12/4/94	15/4/94		27-0	20/4/94		
142	Broytingar í revsilógini.	16/3/94	FL	21/3/94	Rættarnevnd	12/4/94	15/4/94		23-0	20/4/94		
143	Ígildissetan fyri Føroyar av "Nordisk konvention om Social Sikring".	18/3/94	FL	21/3/94	Alm. og heilsun.	6/4/94	12/4/94		27-0	20/4/94		
144	Løgtingslóg um ættleiðingarstuðul.	16/3/94	FL	21/-3-94	Alm.og heilsun	6/4/94	12/4/94 27-0	15/4/94	22-0	9/5/94	51,3/5-94	
145	Løgtingslóg um dagpening vegna ættleiðing.	16/3/94	FL	21/3/94	Alm. og heilsun	27/4/94	28/4/94 26-0	28/4/94	26-0	24/5/94	77,17/5-94	
146	Ígildissetan fyri Føroyar av "Bekendtgørelse af aftale af 9 dec. 1988 med Finland, Island, Norge og Sverige om den retlige stilling for fællesnordiske institutioner og deres ansatte"	18/3/94	FL	21/3/94	Rættarnevnd	12/4/94	21/4/94		25-0	9/5/94		
147	Ígildissetan fyri Føroyar av "Bekendtgørelse af overenskomst af 18. des. 1973 med Finland, Norge og Sverige om samordning af pensionsrettigheder ifølge statslige pensionsordninger" og Bekendtgørelse af protokol af 28. juni 1990 med Finland, Norge og Sverige om ændring af nordisk pensionsoverenskomst af 18. december 1973".	18/3/94	FL	21/3/94	Rættarnevnd	6/4/94	12/4/94		20-0	20/4/94		
148	Ígildissetan fyri Føroyar av broyting um í lóg um radiosámskifti	18/3/94	FL	21/3/94	Samleráðsnevnd					7/9/94		
149	Umskipan av Føroya tlvstrygging til partafelag.	18/3/94	FL	22/3/94	Vinnuráðarnevnd							
150	Løgtingslóg um lut til øl, mineralvatn og líknar leskidrykkir.	18/3/94	FL	23/3/94	Umhvørvisnevnd	15/4/94	21/4/94 25-0	26/4/94	28-0	24/5/94	73,10/5-94	
151	Frádráttur í sjálvuppgávu fyri gávur til vælgerandi endamál, umvælingar av sethúsum v.m.	18/3/94	KFFF	23/3/94	Skattanevnd	12/4/94	22/4/94		4-0	16/5/94		
152	Stovnsetan av toll-og avgjaldstrium havnum, vørugoymslum og framleiðslu økjum	18/3/94	Fólkafl.	24/3/94	Vinnuráðarnevnd	21/4/94	26/4/94		10-0	11/5/94		
153	Skattafrádráttur fyri fiski-og útróðrarmenn.	18/3/94	KFFF	24/3/94	Skattanevnd	21/4/94	26/4/94		4-0	3/6/94		

154	Skattafrádráttur fyri rentur til sethúsalán v.m.	18/3/94	KFFF	23/3/94	Skattanevnd	12/4/94	22/4/94		6-0	31/5/94		
155	Løgtingslóg um keyp av ognini matr. nr. 1340 e, Tórshavn.	18/3/94	FL	23/3/94	Figgjarnevnd	22/4/94	26/4/94 27-0	27/4/94	27-0	24/5/94	58,10/5 94	
156	Løgtingslóg um lántøku til landskass	18/3/94	FL	22/3/94	Figgjarnevnd							
157	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt	18/3/94	FL	22/3/94	Skattanevnd	12/4/94	15/4/94 17-0	26/4/94	17-1	24/5/94	65,10/5 94	
158	Broyting í løgtingslóg um rentuskatt	18/3/94	FL	22/3/94	Skattanevnd	12/4/94	15/4/94	26/4/94	17-0	26/5/94	62,10/5-94	
159	Broyting í løgtingslóg um ferðaavgj	18/3/94	FL	22/3/94	Figgjarnevnd	21/4-26/4	17-1, 25-0	26/4/94	28-0	9/5/94	56,5/5-94	
160	Broyting í løgtingslóg um skrásetin argjald á motorakfarum.	18/3/94	FL	22/3/94	Skattanevnd	26/4/94	27/4/94	28/4/94	30-0	26/5/94	68,10/5-94	
161	Broyting í løgtingslóg um landsskatt kommunuskatt.	18/3/94	S.A.E og J.P	22/3/94	Skattanevnd	26/4/94	23/4/94 afturtikið			16/5/94		
162	Óbroytt ferðagjald við strandferðslu	18/3/94	S.A.E og J.P	22/3/94	Samferðslunevnd	29/4/94	29/4-11/5		13-0	16/5/94		
163	Figgingargrunnur fyri alivinnuna.	18/3/94	KFFF	22/3/94	Idnaðarnevnd	22/4/94	26/4/94		1-0	16/5/94		
164	Avtøka av MVG á neyðsynjarvørum.	18/3/94	KFFF	22/3/94	Skattanevnd	12/4/94	22/4/94		7-0	31/5/94		
165	Broytingar í forsorgarlógini	18/3/94	KFFF	22/3/94	Alm.og heilsun.	27/4/94	28/4/94		7-0	16/5/94		
166	Avtøka av MVG á sjómansheimum, og hotellum/matstovum sum ikki hava skeinkiloyvi.	18/3/94	KFFF	22/3/94	Skattanevnd		22/4/94		1-0	11/5/94		
167	Løgtingslóg um minstuløn til útróðrmenn.	18/3/94	Fiskiv nevn	21/3/94	Fiskivinnunevnd	22/3/94	22/3/94 20-0	22/3/94	20-0	7/4/94	38,24/3-94	
168	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.	18/3/94	T.Niclasen	22/3/94	Skattanevnd	26/4/94	28/4/94			16/5/94		
169	Broyting í ferðslulógini.	18/3/94	T.Niclasen	22/3/94	Rættarnevnd	27/4/94	28/4/94		11-0	16/5/94		
170	Broytingar í meirvirðisgjaldsskrápan	18/3/94	T.Niclasen	22/3/94	Skattanevnd		22/4/94		5-0	11/5/94		
171	Løgtingslóg um fiskavraking.	18/3/94	T.Niclasen	24/3/94	Idnaðarnevnd							
172	Broyting í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju.	18/3/94	FL	22/3/94	Skattanevnd	12/4/94	15/4/94 29-0	21/4/94	25-0	26/5/94	66,10/5-94	
173	Løgtingslóg um ábyrgdargrunn.	18/3/94	FL	22/3/94	Figgjarnevnd	22/4/94	26/4/94 25-0	27/4/94	24-0	26/5/94	69,10/5-94	
174	Løgtingslóg um stuðul til menning	18/3/94	FL	22/3/94	Fiskivinnunevnd	15/4/94	21/4/94	26/4/94	26/4/94	26/5/94	70,10/5 94	

	av tiskivinnuni á landi.							25-0	afl í tiskiv.				
175	Logtingslóg um partapening í tramlakstelag.	18/3/94	FL	22/3/94	Figgjarnevnd	17/5/94	19/5/94	19/5/94	19-3.	18/7/94	84,31/5-94		
176	Góðkenning av ESPOO-sáttmálanum um meting av árinnum á umhvørvið yvirum landsmørk		FL	23/3/94	Umhvørvisnevnd	15/4/94	21/4/94		25-0	9/5/94			
177	Logtingslóg um búskapanáð.	18/3/94	FL	22/3/94	Figgjarnevnd	22/4-17/5	26/4/94	27/4-19/5	14-0	31/5/94			
178	Broyting í logtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.	18/3/94	FL	22/3/94	Figgjarnevnd	12/4/94	15/4/94	21/4/94	21-0	26/5/94	63,10/5-94		
179	Sethósaskuldin.	18/3/94	KFFF	23/3/94	Figgjarnevnd		22/4/94		6-0	31/5/94			
180	Javnbjóðis skatting av hjúnum og støkum.	18/3/94	Fólkafl	23/3/94	Skattanevnd	12/4/94	22/4/94		12-0	31/5/94			
181	Trygging av reallønini og av útgoldnu lønum	18/3/94	Fólkafl.	23/3/94	Figgjarnevnd	22/4/94	29/4/94		5-0	3/6/94			
182	Um loysn av tvupultelkunum hjá Arbeiðsloysisskipanini.	18/3/94	S Midjord	23/3/94	arb.málanevnd	22/4/94	26/4/94		7-0	3/6/94			
183	Trygdarpen fyri avreiðing	21/3/94	J.t.Olsen	24/3/94	Figgjarnevnd	17/5/94				8/6/94			
184	Broytingar í kommunulógini.	18/3/94	FL	23/3/94	Rættarnevnd								
185	Nýggir vinnumøguleikar	18/3/94	KFFF	25/3/94	lønaðarnevnd	22/6/94	26/4/94		2-0	16/5/94			
186	Broytingar í arbeiðsloysisskipanini.	18/3/94	Samt fl.	24/3/94	Arb málanevnd	21/4-22/4	25/4/94		7-0	3/6/94			
187	Familjumál	21/3/94	KFFF	24/3/94	Alm.og heilsun.	21/4/94							
188	Viðvikjandi nýtslu av senditíð hjá Útvarpi Føroya.		T. Niclasen	24/3/94	Ment.og skúlan.	26/4/94	27/4/94		15-0	16/5/94			
189	Logtingslóg um keyp av ognini mati nr. 1 ass, Hoyvík	18/3/94	FI	23/3/94	Figgjarnevnd	22/4-27/4	27/4/94 18-0	28/4/94	19-0	26/5/94	59,10/5-94		
190	Logtingslóg um stýrisskipan Føroya	24/3/94	FL	16/4/94	Serlig nevnd	22/6/94	28/6/94	28/6/94	24-0	18/7/94			
191	Broyting í lóg "um jordbrugsfremme"	24/3/94	FL	18/4/94	Figgjarnevnd								
192	Løgtingslóg um tiskoytisstuðul til forsorgarstuðul vegna tervandi arbeiði.	7/4/94	FL	7/4/94	Alm. og heilsun.	26/4/94	27/4/94 27-0	28/4/94	31-0	26/5/94	72,10/5-94		
193	Áheitan frá ákæruvaldinum samboert § 728 í rættargangslógini.	15/4/94	Formanssk.	21/4/94			aff.til form.sk.			19/8/94			

194	Grannskoðan av almennum roknskapum løgtingslóg um løgtingsgrannskoðararnar (174/92).				Figgjarnevnd	15/4/94	21/4/94 m.tinganevnd		2-0			
195	Grannskoðan av almennum roknskaptum reglugerð um val og virki løgtingsgrannskoðaranna (176/92)				Figgjarnevnd		21/4/94 m.tinganevnd		26-0			
196	Grannskoðan av almennum roknskaptum - løgtingslóg um løgtingsgrannskoðarnar (174/92).				Figgjarnevnd		21/4/94 m.tinganevnd		26-0			
197	Ígildissetan lyri Foroyar av "Lov om sociale ydelser på Færøerne".	15/4/94	FL	21/4/94	Alm og heilsun							
198	Broyting í løgtingslóg um tær kommunalu figgjarætlanirnar, ásetan av kommunu	15/4/94	FL	21/4/94	Figgjarnevnd	17/5/94	19/5/94 31-0	19/5/94	30-0	18/7/94	85,31/5-94	
199	Broytin í løgtingslóg um minstulan, dagstudning og minstaforvinning.	21/4/94	FL	23/4/94	Fiskivinnunevnd	4/5/94	9/5/94 31-0	11/5/94	31-0	31/5/94	80,25/5-94	
200	Broyting í løgtingslóg um almennar o privatar skráir.	4/5/94	FL	9/5/94	Rættarnevnd	19/5/94	19/5/94 25-0	19/5/94	22-0	10/7/94	86,15/6-94 87,30/5-94	
201	Ognan av fastum eigindómi	4/5/94	FL	23/4/94	Rættarnevnd							
202	Útskriving av nývali.	11/5/94	Sambandtl	17/5/94	Rættarnevnd	19/5/94	19/5/94		29,-2	20/5/94		
203	Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.	ei framl	KFFF									
204	Samráðingar við donsku stjórnina.	ei framl	T.Niclasen									
205	Áseting av skatti til landskassan	ei framl	J.Lindenskov									
206	Viðvikjandi støðu fjarra arbeiðsleys	22-Jun ei framl.	T.Niclasen									
	ONNUR TINGSETA 1993											
207	Løgtingslóg um stýrisskipan Føroya. (190/93)	20/7/94	FL	22/7/94	Serligu stýrisskanar nevndina.	25/7/94	25/7/94 26-0	25/7/94	29-0	26/8/94	103,26/7-94	

	FYRISPURNINGAR	Viðvíkjandi	Frá	Fráboðaður	Kvøðugreiðsla	Atkvøður	Svaraður	Avgreitt
100-1	Jóannes Eidesgaard	Trygdargr[illegible]i avr og lønir	Jógvan I Olsen		28/10/93	24-0	23/11/93	10/12/93
100-2	Marita Petersen, løgmann	mbætism.[illegible]lp úr Danmark	N P Danielsen		29/10/93	23-0	20/1/94	10/2/94
100-3	Marita Petersen, løgmann	Áheitan á landsst um [illegible]at fáa lista	Hergeir Nielsen	15/11/93	23/11/93	25-0	17/2/94	3/2/94
100-4	Jóannes Eidesgaard	bursk hjá[illegible]nenning.tar. í Vágum	S.A Ellefsen	23/11/93	25/11/93	26-0	1/2/94	10/2/94
100-5	Jóannes Eidesgaard	Ásetan av hungursmar[illegible]k í	Tórður Niclasen	23/11/93	25/11/93	21-0	25/1/94	10/2/94
100-6	Signar á Brúnni	Ut og umb[illegible] flogv.farstøðini	S.A Ellefsen		2/12/93	22-0	20/1/94	10/2/94
100-7	Marita Petersen, løgmann	Setan av[illegible]ora í Tinganesi	Oli Breckmann		20/1/93	25-0	20/1/94	3/8/94
100-8	Bergur Jacobsen	At fremja[illegible]ogbr mnan[illegible]lanebanað.n	A. Kallsberg	18/1/94	20/1/93	25-0	23/2/94	30/3/94
100-9	Finnboga Isaksen	Nið.skr.av[illegible] hjá velbilletanum	Hans T. Olsen	25/1/94	25/1/94	19-0		8/6/94
100-10	Thomas Arabo	ramt. meg[illegible]hyrl aling a[illegible] Sørvágstirð	S A. Ellefsen	1/2/94	1/2/94	22-0	28/4/94	16/5/94
100-11	Jóannes Eidesgaard	Virks.hjá[illegible]serum í alm[illegible] málum	N.P.D og L.Bjð		8/2/94	15-0	kki svarast	10/2/94
100-12	Thomas Arabo	Skeljav. á[illegible]maru leiðu[illegible] norðoart og	N P Danielsen	15/2/94	18/2/94	16-0	kki svarast	30/3/94
100-13	Signar á Brúnni	Prish. á[illegible]rða og tuf[illegible] við skip hjá	N.P.Danielsen	28/2/94	4/3/94	28-0	4/3/94	3/8/94
100-14	Jóannes Eidesgaard	Kærur í[illegible]alm. malum	N P Danielsen	18/3/94	22/3/94	23-0	28/4/94	8/6/94
100-15	Bergur Jacobsen	Loyvi til[illegible] nærvarp í[illegible] Føroyum	T. Niclasen	18/3/94	22/3/94	22-0		8/8/94
100-16	Jóannes Eidesgaard	Heilsu og[illegible]sjúkr leiðs[illegible]nnan heilsu	T. Niclasen	18/3/94	22/3/94	23-0	28/4/94	9/5/94
100-17	Marita Petersen, løgmann	Setan av[illegible]agtingsins[illegible] umboðsmans	T. Niclasen	18/3/94	22/3/94	24-0	28/4/94	9/5/94
100-18	Marita Petersen, løgmann	pazing og[illegible] bygn.brt í[illegible]avt frá 12.o	T. Niclasen	18/3/94	22/3/94	25-0		8/6/94
100-19	Marita Petersen, løgmann	skráseting[illegible]ittið, þ-tal v m	N P Danielsen	18/3/94	22/3/94	21-0	28/4/94	3/8/94
100-20	Finnboga Isaksen	útanlands[illegible] skuldin	N P.Danielsen		23/3/94	19-0		8/6/94

Ólavsøkutingsetan 1993

Ár 1993, hósdagin 29. juli kl. 13.00 varð løgtingið sett. Tingformaðurin frá seinastu tingsetu, Lasse Klein, las upp skriv dagfest 21. juli 1993, har løgmaður stevnir løgtingsmonnum til tings ólavsøkudag og lýsti ólavsøkutingið 1993 at vera sett.

Tingmenninir eru:

Norðoya valdømi:	Anfinn Kallsberg, Viðareiði, ff., Vilhelm Johannesen, Klaksvík, jv., Asbjørn Joensen, Klaksvík, sj., Heini O. Heinesen, Kunoy, tj., N. P. Danielsen, Klaksvík, krf.
Eysturoyar valdømi:	Olaf Olsen, Glyvrar, ff., Edmund Joensen, Oyrabakki, sb., Jógvan I. Olsen, Toftir, sb., Jørgen Thomsen, Skála, jv., Lasse Klein, Saltangará, sj., Signar á Brúnni, Fuglafj., tj., Tordur J. Niclasen, Eiði, krf.
Norðstreymoyar valdømi:	Terje Davidsen, Kollafjørður, sb., Thomas Arabo, Signabøur, jv.
Suðurstreymoyar valdømi:	Jógvan Sundstein, Tórshavn, ff., Birgir Danielsen, Tórshavn, ff., Óli Breckmann, Tórshavn, ff., Lisbeth L. Petersen, Tórsh., sb., Finnbogi Arge, Tórshavn, sb., Atli P. Dam, Tórshavn, jv., Marita Petersen, Tórshavn, jv., Helena Dam á Neystabø, Tórsh., sj. Finnbogi Ísakson, Tórshavn, tj.
Vága valdømi:	Svend Aage Ellefsen, Sandav., ff., Frank S. Davidsen, Sørvágur, jv.
Sandoyar valdømi:	John Petersen, Skopun, ff., Jógvan A. Johannessen, Skopun, jv.
Suðuroyar valdømi:	Flemming Mikkelsen, Vágur, sb., Henrik Old, Vágur, jv., Sverre Midjord, Tvøroyri, jv., Jóannes Eidesgaard, Tvøroyri, jv., Hergeir Nielsen, Vágur, tj.

Formaðurin frá seinastu tingsetu, Lasse Klein, bað tingmenninar Sverra Midjord og Svend Aage Ellefsen vera fyribils tingskrivarar.

Síðani fór fram val av formansskapi tingsins:

Til formann varð Lasse Klein valdur. Til 1. næstformann varð Anfinn Kallsberg valdur; til 2. næstformann varð Jógvan A. Johannesen valdur og til 3. næstformann varð Jógvan í. Olsen valdur.

Til 1. og 2. skrivarar vórðu valdir ávikavist Sverre Midjord og Svend Aage Ellefsen.

LØGMANSRØÐAN Á ÓLAVSØKU 1993

Politiska støðan og gongdin

Fyrstu mánaðirnar í ár hendu fleiri broytingar á politiska økinum.

Tá samgongan millum Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin tók við í januar 1991, boðaði Atli P. Dam frá, at hann bert fór at sita í løgmansstarvinum í tvey ár, og við løgmansskiftið 18. januar 1993 broyttist eisini talið á landsstýrismonnum hjá javnaðarflokkinum, soleiðis at Javnaðarflokkurin nú hevði løgmann og tveir landsstýrismenn.

Í samgongu millum tveir so ólíkar flokkar sum Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin slepst ikki undan, at ymisku politisku grundsjónarmiðini koma týðiliga til sjóndar, tá búskapartrupulleikarnir gerast so stórir og álvarsligir sum hjá okkum.

Havandi í huga allar trupulleikaranar, vit hava í dag, er tað skyldan hjá okkum politikarum so væl sum til ber at virka fyri politiskum støðufesti og friði. Men tað krevur gott samstarv og vilja at finna felags loysnir. Er ikki so, gerast politisku viðurskiftini ótrygg.

Ásannandi at samgongan millum Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin ikki longur var før fyri at tryggja politiskan frið og støðufesti, varð 24. apríl í ár onnur samgonga skipað millum Javnðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin.

Um ikki hevði borið til at skipað nýggja samgongu, hevði helst ikki verið annar møguleiki enn at skriva út nýval. Hetta kundi sjálvsagt eisini verið rætt, men sum støðan er nú, hevði tað verið sera óheppið í fleiri mánaðir at havt eitt landsstýri, sum ikki var ført fyri ella hevði myndugleika at stýra og taka nýggjar avgerðir.

Tí er at fegnast um, at til bar at skipa sitandi samgongu, sum hevur sum fremsta arbeiðssetning at virka fyri at bøta um búskaparstøðu okkara og harvið skapa fyritreytir fyri øktum virkssemi í samfelagnum.

Høvdu vit á ólavsøku í fjør verið før fyri at sæð inn í framtíðina og sæð, hvat ið fór at henda komandi árið, høvdu flest øll helst ótast við. Tí samfelag okkara hevur neyvan verið fyri størri bakkøstum í so stutta tíð sum seinasta árið.

Víst kendu vit truplu støðuna í vinnuni: Stóra minkingin í veiðunøgdini, fallandi fiskaprísirnir og vaksandi talið á trotabúgvum, sum so aftur høvdu við sær vøkstur í almennu veðhaldsútleggunum og øking í arbeiðsloysinum.

Eisini vóru vit greið yvir, at tað fór at verða trupult at gjalda alla okkara uttanlandsskuld aftur næstu árini, og at tað fór at tyngja um bæði hjá tí almenna og einstaklinginum.

Men at veiðunøgdin við Føroyar fall við meira enn 25.000 tonsum seinasta árið, at botnurin heilt fór undan fiskamarkaðinum, at veðhaldsútleggiñi hjá landskassanum komu upp ímóti 300 milliónum, at arbeiðsloysið fór upp um 20%, og at fólkatalið í Føroyum kom niður á 46.544 fólk, hevði helst eingin hugsað sær.

Og støðuna hjá bankunum kendu vit ikki.

Sjálvsagt var væntandi, at støðan í samfelagnum eisini hevði ávirkan á bankarnar; men vit kendu okkum trygg, at bankarnir í teimum góðu peningaríku tíðunum høvdu sett nóg mikið av at standa ímóti við, tá verri fór at ganga.

Á flestu okkara kom tað, sum hendi 6. oktober 1992, púra óvart.

Fyrsta bankakreppan førdi til avtaluna við Danmark tann 6. oktober, tá landsstýrið lænti 500 mió. kr. til m.a. at seta í Føggingargrunnin frá 1992, sum so setti pening í Sjóvinnubankan.

Men ikki var nóg mikið við hesum. Í februar var neyðugt at læna 350 mió. kr. alfurat at seta í Føggingargrunnin at stuðla Sjóvinnubankanum við.

Í mars hendi so aftur ein broyting í ognarviðurskiftunum í føroysak bankaheiminumm, og tíverri er fryktandi fyri, at enn eru ikki allir trupulleikarnir hjá bankanum loystir. Tí er komið við í rammuavtaluna frá mei mánaði møguleikin at læna 540 mió. kr. til føroysku vankarniar.

Mangur føroyingur spyr helst, um rætt varð atborið? Er rætt at skuldarbinda vanliga skattahorgaran í Føroyum við umleið einari milliard í peningi at bjarga teimum privatu bankunum við og á henda hátt at flyta privatskuld yvir í landskassan?

Hvat hevði hent, um vit ikki høvdu bjargað bankunum? Hevði onkur annar gjørt tað, eila høvdu bankarnir farið, hvat hevði so hent?

Alt hetta eru spurningar, vit kunnu seta; men vit hava ikki nakað greitt svar. Bert mugu vit staðfesta, at tá bankakreppurnar stungu seg upp, tók landsstýrið avgerð um at bjarga bankunum, og løgtingið hevur góðkent avtalurnar, sum landsstýrið gjørdi.

Fíggjar- og búskaparmál

Afturgongdin í búskapinum tey seinastu árini við hópi av húsagangum innan vinnuna, minkandi virksemi, minkandi lønarinntøku, minkandi skatti og tørvandi megi hjá vinnuni at gjalda sínar skyldur hevði ta avleiðing á heysti í 1992, at teir báðir stóru bankarnir komu í trongstøðu.

6. oktober varð ein avtala undirskrivað um 500 mió. kr. í láni úr ríkiskassanum til landsstýrið. Tær 300 mió. kr. vórðu settar sum nýggjur eginpeningur í Sjóvinnubankan.

meðan 200 mió. kr. vórðu nýttar til at bøta um gjaldføri landskassans. sum eisini var út av lagi vánaligt. 200 mió. kr. lænti landsstýrið haraftórat úr fleggingargrunninum fyri Føroyar og setti peningin í sjóvinnubankan.

Føroya Banki kom eisini í trongstøðu, og nakað seinni setti høvuðspartacigarin í hesum banka, Den Danska Bank, 300 mió. kr. sum nýggjan eginpening í bankan. Bæði Sjóvinnubankin og Føroya Banki niðurskrivaðu virðið á partapeninginum.

Longu 1. februar 1993 var Sjóvinnubankin aftur komin í trongstøðu. Landsstýrið tók 350 mió. kr. aftrat í láni úr ríkiskassanum og styrkti bankan við nýggjum eginpeningin.

Í mars mánaði keypti ffggingargrunnurin meirilutan av partapeninginum í Føroya Banka frá Den Danske Bank, sum afturfyri yvirtók 30% av partapeninginum í Sjóvinnubankanum. Den Danske Bank eigur eisini 30% av partapeningum í Føroya Banka.

28. mai varð ein rammuavtala gjørd millum landsstýrið og stjórnina, sum tryggjar landsstýrinum møguleika at fáa lán úr ríkiskassanum til afturgjalding av uttanlandsskuld landskassans tey komandi árini. Samstundis varð avtalað, at landskassin skuldi taka 1 mia. kr. í láni úr ríkiskassanum beinanvegin, 440 mió. kr. fóru til gjaldførið landskassans. Hinar 560 mió. kr. standa tøkar at nýta sum gjaldførishjálp ella nýggjur eginpeningur í báðum bankunum, um tað gerst neyðug.

Landskassin eigur sostatt meirilutan av partapeninginum í Sjóvinnubankanum og Føroya Banka.

Sambært avtalunum við stjórnina verður partapeningurin umsitin ígjøgnum tann sonevnda Fíggingargrunnin frá 1992, sum við sínum meiriluta á aðalfundi velur nevndirnar í bankanum.

Nevndin í Fíggingargrunninum frá 1992 hevur fimm limir. har danska stjórnin hevur valt tríggjar limir, meðan landsstyrið hevur valt tveir. Seinni hevur landsstýrið tryggjað sær rætt til eisini at hava tveir cygleiðarar á fundum í nevndini.

Í sambandi við lántøkurnar úr ríkiskassanum vórðu ávísar fyritreytir settar í avtaluna. Tær vóru m.a. - ein bygnaðarnevnd skuldi setast at gera tilmæli um fiskivinnuna í framtíðini - at javnvág skuldi fáast í inntøkur og útreiðslur hjá Arbeiðsloysistryggingini

- at onki nýtt almenn byggiarbeiði skuldi setast í gongd í 1993, og

- at danskar lógir við fyriskipanum skuldu setast í gildi um partafeløg, smápartafeløg, roknskap, vinnugrunnar, bankar og sparikassar og um ávísar fíggingargrunnar.

Allar hesar treytir eru loknar.

Harumframt setti stjórnin teytir um- at inntøkur og útreiðslur landskassans í 1993 skuldu javnviga, og - at tryggjast skuldi, at hækkandi kommunuskattur ikki tyngdi um hjá landskassanum.
Hesar treytir eru ikki loknar enn. Landsstýrið hevur eisini bundið seg til, at tað skal ikki uttan

góðkenning frá stjórnini taka nýggj uttanlandslán, økja landskassans skuld ella veita nýggj veðhald.

Landsstýrið legði fíggjarlógaruppskotið 1993 fyri tingið í august 1992, har roknað varð við einum halli uppá 150 mió. kr. Eftir kravi frá stjórnini um, at javnvág skuldi vera á fíggjarlógini, gjørdi landsstýrið nýtt uppskot, har roknað varð við einum yvirskoti uppá 29 mió. kr.

Men tann búskaparliga gongdin hevur verið so vánalig, at stórt hall verður á fíggjarlógini í ár. Tað er torført at meta um ávís viðurskifti, m.a. um inntøkurnar av beinleiðis og óbeinleiðis skatti restina av árinum, og hvussu stór tey samlaðu útleggini fyri veðhald gerast - meu mett verður, at beinleiðis hallið í ár verður um eina hálva miljars krónur.

Aðrar útreiðslur, sum landskassin hevur havt og fer at hava í árinum, skulu leggjast aftrat hesum halli. Her er talan um tær 350 mió. kr., sum eru settar sum eginpeningur í Sjóvinnubankan í ár, 140 mió. kr., sum eru lagdar út fyri almennar grunnar, og 60 mió. kr., sum eru lagdar út fyri IRF. Tilsaman verður hall landskassans í ár sostatt um eina miljard krónur.

Útlit eru ikki, at javnvág fæst á fíggjarlógina í 1994 heldur, men væntandi verður undirskotið munandi minni enn í ár.

Samráðingar verða við stjórnina um mánaðarskiftið september-oktober um ríkiskassalán til hallið á fíggjarlógini og til afturgjalding av uttanlandslánum næstu árini.

Lands- og kommunuskatturin fyrra hálvárið er 4,8% minni enn fyrra hálvár 1992. Samstundis er býtið av skattinum millum landskassan og kommunurnar broytt. Landsskatturin var minni fyrra hálvár sammett við fyrra hálvár í fjør, meðan kommunuskatturin øktist í sama tíðarskeiði. Kommununna partur av skattinum var størri fyrra hálvár í ár enn somu mánaðir í fjør.

Orsøkin er, at fleiri kommunur hava hækkað skattaprosentið munandi, og tann niðurskurður, sum verður gjørdur, tá tann áliknandi skatturin fer upp um 50%, nervar fyrst og fremst landskassan. Landsstýrið fer í heyst at leggja uppskot fyri tingið um at broyta skattalógina soleiðis, at tað høga skattaprosentið í kommunum ikki nervar landskassans inntøkur ov nógv.

Netto uttanlandsskuldin minkaði úr 8,2 mia. kr. í 1991 niður í 7,8 mia. kr. í 1992. Landskassans uttanlandsskuld er við lánum úr ríkiskassanum uppá 1,3 mia. kr. í ár komin upp á 4,1 mia. kr.

Í 1991 var yvirskot á gjaldsjavnanum uppá 400 mió. kr., og í 1992 var javnvág.

Handilsjavnin er framvegis góður. Í 1991 vísti handilsjavnin eitt yvirskot upp á 760 mió. kr., og í 1992 var yvirskotið 485 mió. kr., bæði tølini uttan útflutning av skipum. Ein broytt skráseting arskipan fyri innflutningin í 1992 ger sitt til, at avlopið tykist væl minni enn árið fyri.

Fyrra hálvár í ár vísir handilsjavnin eitt yvirskot upp á 363 mió. kr., sum er 300 mió. kr. betri enn fyrra hálvár í 1992. Útflutningsvirðið minkaði 50 mió. kr. fyrra hálvár í mun til fyrra hálvár í fjør, meðan innflutningurin minkaði heilar 350 mió. kr. Innflutningurin av so at siga øllum vørusløgum minkaði, tó so at innflutningurin av nýtsluvørum minkaði mest.

Rentubyrðan av uttanlandslánunum er stór. 350 mió. kr. standa á fíggjarlógini í ár til rentur, og talið fer at voga upp ímóti teimum 400 miljónunum næsta ár.

Rentulækking í Týsklandi kann tó hava við sær, at rentubyrðan hjá landskassanum verður minni. Roknað varð við, at henda rentulækking fór at spara landskassanum 45 mió. kr. í ár og 80 mió. kr. næsta ár. Men valutaspekulantar hava lagt slíkt trýst á donsku krónuna, at rentan í Danmark er hækkað 2% fyribils, men hildið verður ikki, at henda høga rentan fer at standa við.

Sum heild hevur rentulækking stóran búskparligan týdning. Nevnast kann, at samlaðu lánini í Føroyum og uttanlands vórðu í 1991 gjørd upp til 23 mia. kr. Ein rentulækking upp á 1% gav tá einstaklingum, feløgum og tí almenna sparingar upp á 230 mió. kr.

Teir føroysku peningastovnarnir hava lækkað út- og innlánsrentuna í ár, men rentumarginalurin er framvegis stórur. Minkar tapsvandin hjá bankunum, kann hugsast, at rentumarginalurin fer at minka.

Ilt er meta um, hvussu búskaprliga gongdin fer at verða frameftir. Øll bíða eftir, at sancringin av fiskavikjum skal verða liðug. Fyrr enn hetta arbeiðið er fingið frá hondini, vita hvørki myndugleikar, vinnulív ella peningastovnar, hvat gerast skal hvussu. Tí er umráðandi, at nevndin, sum arbeiðir við sancringini, og peningastovnarnir bera skjótt at.

Tann umskipan av samfelagsbúskapinum, sum nú fer fram, hevur við sær, at størri fíggjarlig ábyrgd verður løgd á einstaklingin. Landskassin veitir ikki fleiri veðhald, og landsstýrisins støða er, at kommunurnar ikki eiga at yvirtaka tann lut í vinnuni, sum áður lá hjá landskassanum.

Føroyingar eiga væl av peningin í innistandandi, bæði í føroyskum og útlendskum peningastovnum, og tað er at vóna, at kvinnur og menn hava áræði at seta neyðugan pening í nýggjar vinnufyritøkur, sum verða stovnaðar á haldgóðum grundarlagi. Landskassin kann so spaða til við avmarkaðum fløgustudningi.

Arbeiðsloysið

Tá ið lógin um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing varð smíðað, var hugsanin, at arbeiðsloysið fór at liggja um eini 7-8%. Støðan er í dag tann, at arbeiðsloysið liggur oman fyri 20%.

Stutt eftir, at útgjaldingarnar úr arbeiðsloysisskipanini byrjaðu, gjørdist greitt, at inntøkurnar til skipanina vóru lægri enn útgjaldingarnar. Í vár var neyðugt at veita stuðul og lán til skipanina umframt at broyta lógina, so frægari javnvág fekst millum útgjøld og inntøkur.

Lógin um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn er broytt soleiðis, at inngjøldini til grunnin nú fara til arbeiðsloysiskipanina til 1. apríl 1994.

Hesi tiltøk eru gjørd í tættum samstarvi við stýrið fyri arbeiðsloysisskipanina og arbeiðsávísingina. Um samfelagsstøðan ikki batnar, kann skipanin fáa fíggjartrupulleikar komandi árini.

Landsstýrið fer at undirskriva sáttmála um at samskipa donsku og føroysku arbeiðsloysisskipanirnar í næstum.

Í ár eru 5 mió. kr. avsettar á fíggjarlógini til arbeiðsskapandi tiltøk fyri ung, og hava kommununar sýnt játtanini stóran áhuga. Reglugerð fyri játtanina er gjørd, og er ætlan landsstýrisins í komandi ári at økja hesa játtan.

Lógin um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing er broytt soleiðis, at tað ber til at fáa arbeiðsloysisstuðul í samband við ávís arbeiði í styttri tíð.

Umsitingin ger reglur um arbeiðsskapandi tiltøk, tá ið veitingar vegna arbeiðsloysi verða latnar eftir forsorgarlógini.

Arbeiðmarknaðarmál

Lógin um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir er broytt soleiðis, at útgjaldsupphæddin er minkað, og dagatalið fyri avreiðingar er hækkað upp í 30 dagar. Lógin um frítíð við løn er broytt soleiðis, at frítíðin er stytt og frítíðarlønin lækkað.

Flestu felløgini hjá teimum almennt løntu gjørdu fyrr í ár ískoytissáttmála við landsstýrið um lønalækking at galda til 1. januar 1994. Við hesum vístu fakfelløgini, at tey skiltu álvarsomu støðuna í samfelagnum, og hava tey verið við til at hurið ta búskaparligu afturgongdina.

Landsstýrið hevur í juli gjørt lønarsáttmálar við tey felløg hjá almennt settum at galda til 1. juni 1995.

Allir aðrir sáttmálar millum landsstýrið og fakfelløgini fara úr gildi 1. januar 1994. Vónandi føra komandi samráðingar til eina loysn, sum allir partar kunnu liva við.

Fiskivinnumál

Bygnaðarnevndin, sum landsstýrið setti í vár at koma við uppskoti m.a. um, hvussu tilfeingið við Føroyar verður troytt á skilabestan hátt, varð liðug 1. juli. Landsstýrið er sinnað í høvuðsheitum at fylgja tí stevnu, ið nevndin tilmælir.

Fyri, øll sjónarmið kunnu koma fram, og so breið undirtøka sum til ber, kann fáast fyri loysnum í hesum álvarsmáli, leggur landsstýrið álitið fyri løgtingið til umrøðu beinanvegin.

Hóast føroyski fiskiflotin ikki er ov stórur til framtíðina, so er tað ein sannroynd, at við verandi tilfeingi er fiskiflotin alt ov stórur. Neyðugt verður tí hjá einum parti av flotanum at fara undir at veiða alternativ fiskasløg og royna ótroyttar møguleikar.

Tí hevur landsstýrið givið rættiliga nógv royndarloyvi við nýggjum veiðuháttum eftir havtasku, svartkalva, krabba, stinglaksi, langasporli og gulllaksi.

Landsstýrið er sinnað at geva nøkur innflutningsloyvi til skip at troyta ónýtt tilfeingi í altjóða og egnum sjógvi.

Livilíkindini hjá langfaraflotanum, sum sóu ógvuliga døpur út, gjørdust rættiliga óvæntað betri, nú stóra rækjuøkið á Flemish Cap varð funnið. Landsstýrið fylgir væl við í tí, sum fer fram har, og er við í samráðingunum í NAFO um nýggju fiskileiðirnar.

Heimaflotin er meint raktur av fiskaprískreppuni á europeiska marknaðinum. Avreidd eru í ár sløk 32.000 tons, so samlaða talið fyri árið fer neyvan upp um 69.000 tons móti umleið 77.000 seinasta ár.

Fiskiídnaðurin er merktur av stóru figgjarkreppuni í samfelagnum, og stígur er tí komin í at ganga nýggjar leiðir. Nú føroyski figgjarheimurin er komin í fastari legu, og stóra skuldin í ídnaðinum er skorin burtur, skuldu møguleikar verið fyri at hildið fram við at umleggja fiskiídnaðin til at framleiða lidnar vørur beinleiðis til brúkaran.

Veiðunøgdin hjá feskfiskaflotanum minkar so mikið nógv, at tað er umráðandi at gongd kemur á aftur rávøruinnflutningin til fiskiídnaðin. Landsstýrið arbeiðir við ætlanum um at stimbra fiskiídnaðin í marknaðarføringini, bæði tá talan er um tann amerikanska og tann europeiska marknaðin.

Alivinnan

Í 1992 var útflutningsvirðið á alifiski 579 mió. kr. burturúr eini framleiðslunøgd uppá 17.200 tons. Árið fyri var útflutningsvirðið 545 mió. kr. og framleiðslan 18.100 tons. Økta útflutningsvirðið í mun til framleiðsluna stavar frá hægri prísum og betri tamarhaldi á heilsustøðuni.

Hóast økta útflutningsvirðið hevur alivinnan nógvar trupulleikar at dragast við, og fleiri alibrúk eru niðurløgd. Stórur partur av alivinnuni verður fíggjarliga umskipaður, og samtykti løgtingið á vár at geva stuðul til smoltkeyp næstu trý árini, so at alivinnan í eina tíð betur kann umskipast.

Smoltútsetingin í ár er á sama støði sum í fjør, t.v.s. góðar 5 mió. smolt, talið á alistøðum minkar. Í fjør settu 30 støðir út og í ár settu umleið 20 støðir út. Metta framleiðslan er í ár 17.000 tons og 15.000 tons næsta ár.

Landsstýrið ætlar í komandi tingsetu at broyta lógargrundarlagið fyri alivinnuna so vinnan fær greiðari reglur at virka eftir. Fyri at verja umhvørvið verður miðað ímóti at fækka alileyvini í ávísum økjum og eggja alarunum at leggja út á nýggjum leiðum, so trýstið á umhvørvið verður hóskandi og javnari um landið.

Sjóvinnumál

Føroyska altjóðaskipaskráin hevur verið í gildi í eitt ár. og higartil eru 15 skip skrásett. Trý útlendsk skip standa á skránni. Skal talið á útlendskum skipum. skrásett í Føroyum, økjast. verður neyðugt at broyta ávísar lógir. Tær broytingar, ið landsstýrið umhugsar. eru í lóg um trygging. í lógunum um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn og trygdargrunn og í lóg um arbeiðsloysistrygging.

Í sjómanslógini frá 1988 eru reglurnar at tryggja sjómenn móti inntøkumissi broyttar. Lógin verður nú sett í gildi. og umsitingin av sjóvinnulóggávuni og skipaskrásetingin verður samskipað við skipaeftirlitið 1. oktober.

Ídnaður

Sum fráboðað í seinastu ólavsøkurøðu kom føroyskur ídnaður í fría kapping við útheimin 1. januar í ár.

Sjálvt um handilssáttmálin við EF hevur virkað hampuliga væl. so hava hesar broyttu fortreytirnar serliga givið teimum fyritøkum trupuleikar. ið hava grundað seg á framleiðslur aftan fyri gamla verjutollmúrin. Nakrar fyritøkur hava tikið av avbjóðingini og hugsað meir og meir um at virka á altjóðamarknaðum.

Tað, at føroyskur ídnaður skal virka í fríari kapping við útheimin, er ein stór avbjóðing, og ásannast má, at annar trupulleikin er, at føroyingar keypa ikki nóg nógv føroyska framleiðslu, hóast føroyska vøran hevur somu dygd og sama pris.

Landbúnaður

Ilesi seinnu árini hevur landbúnaður ment seg í stórum. so at vit í dag tosa um ovurframleiðslu av eitt nú mjólk. Best hevði verið, um vit framleiddu meira kjøt, men prískappingin uttaneftir er so stór, at hesin tátturin hevur ilt við at fóta sær.

Játtanin til Royndarstøðina í Kollafirði er munandi skerd, og verður tí virksemið hjá støðini endurskoðað. Ætlanin er kortini at halda fram við royndarvirkseminum, serliga við kanningum av føroyskum fóðri, og støðan verður í størri mun ein landbúnaðarmiðdepil.

Ferðavinnan

Ferðavinnan verður at menna við atliti til náttúru, umhvørvi og mentan okkara, so tey ikki verða nervað av vaksandi ferðavinnu. Hetta er neyðugt, um vit skulu byggja upp eina varandi ferðavinnu.

Ferðavinnan hevur tann fyrimun, at hon er ikki so íløgukrevjandi, sum nógvar aðrar vinnur, samstundis sum inntøkurnar spjaðast um landið og manna millum. Vinnan kann tí gerast eitt gott ískoyti til búskapin og kann eisini skapa nógv arbeiðspláss.

Ein skjót framgongd innan ferðavinnuna krevur, at politikarar, ferðaráð og privata vinnan arbeiða neyvt saman og taka tøk í felag.

Ferðaráð Føroya ætlar í januar 1994 at leggja fram eina verkætlan um at skipa og menna føroysku ferðavinnuna.

Lógamál

Umfatandi broytingar eru framdar í vinnulívslóggávuni. Nýggjar lógir eru komnar um ávísar kredittstovnar, lóg um bankar og sparikassar v.m., lóg um vinnurekandi grunnar, lóg um ársroknskapir fyri ávís feløg, lóg um smá lutafeløg og lóg um partafeløg. Nakrar lógir vórðu settar í gildi 1. juli, aðrar koma í gildi 1. januar 1994.

Landsstýrið ætlar eisini at leggja uppskot fyri tingið um nýggjar lógir fyri alt tryggingartøkið, soleiðis at bæði tryggingarlóggáva og vinnulívslóggáva lúka øll krøv til nútímans evropeiskt lógaverk.

Fyri tveimum árum síðani setti landsstýrið nevnd at viðgera skrásetingarlóggávuna. Vegna stórar arbeiðsbyrðar er arbeiðið ikki liðugt. Í komandi tíð fer landsstýrið at streingja á at fáa arbeiðið liðugt, soleiðis at til ber at fáa nýggja ella broytta lóggávu í hesum øki í tingárinum.

Á teimum økjum, ið ikki eru føroysk sermál, er tað so, at vit her í Føroyum í mongum førum virka undir gamlari danskari lóggávu. Orsøkin kann vera, at vit føroyingar ikki vilja hava nýggju donsku lógirnar ella, at vit ikki hava fingið í lag at seta tær donsku lógirnar í gildi í Føroyum.

Farið verður undir at fáa dagført ymsar lógir á borgarrættarliga økinum, serliga innan familju- og persónsrætt.

Skúlamál

Ein høvuðshending á fólkaskúlaøkinum er, at skúlin í ár heur fingið nýggjar leiðbeinandi lesiætlanir frá 1. til 10 flokk og nýtt álit um tíma- og lærugreinabýti.

Í fjør tók landsstýrið stig til saman við skúlabókagunninum at skipa fyri serligum tiltaki, sum bar í sær, at skúlarnir kundu fáa meiri og bíligari undirvísingartilfar. Skipanin hevur fingið góða undirtøku og heldur fram í ár.

Arbeitt verður við at fáa Bókamiðsøluni hóskandi karmar til virksemi sítt

Arbeiðsbólkurin, sum skuldi gera ítøkilig uppskot til nýggja studentaskúla- og HF- skipan er komin langt. Ætlandi verður eitt samlað lógaruppskot lagt fyri løgtingið um 1. desembur, soleiðis at nýggja studentaskúla- og HF- skipan fer at virka næsta skúlaár.

Tá skúlin byrjar aftur, fer studentaskúlin og HF- skeiðið í Eysturoynni í nýggj høli á Kambsdali.

1. august eru heimaskipara-, skipara- og skipsføraraútbúgvingarnar samskipaðar.

Tilgongdin er stór bæði til sjómansskúlarnar og maskinskúlan. Sum er hava skúlarnir tað trupult fíggjarliga og hava hvørki orku ella húsaumstøður til at taka allar næmingarnar, sum søkja.

Teknisku skúlarnir eru farnir undir nýggjar tøkniligar útbúgvingar. SIT útbúgvingarnar byrjaðu í fjør, og í august byrja verkstaðarskúlarnir og HT, ella tøkniligt studentsprógv.

Landstýrið fer í hesi tingsetu at leggja fyri løgtingið uppskot til lóg um ráðskipan fyri útbúgvingarnar á vinnuskúlaøkinum, ið tryggjar vinnuni neyðugt innlit og neyðuga ávirkan.

Hóast játtanin til Fróskaparsetrið á løgtingsfíggjarlógini er munandi skerd, er virksemið á stovninum ikki so nógv merkt av hesum. Tó eru onkrar ætlaðar útbúgvingar fyribils útsettar, meðan aðrar nýggjar útbúgvingar eru settar á stovn á royndarstigi.

Eitt tað støsta tiltakið í løtuni er tann stóra móðurmálsorðabókin, sum er ætlað at koma út í 1995. Tað næsta verður at fara undir eina stóra dansk-føroyska orðabók.

Mentanarmál

Hóast Føroyar eru vorðnar sjálvstøðugt biskupsdømi, er kirkjuliga lóggávan framvegis donsk. Ein stórur partur av kirkjuligu lóggávuni er gamal, og í øðrum førum vænta lógarheimildir. Tí verður kirkjuliga lóggávan dagførd.

Hóast trongu hølisviðurskiftini megnar starvsfólkið á Sjónvarpi Føroya at gera 500 tímar við føroyskum tilfari um árið. Hetta er munandi meira enn aðrar sjónvarpsstøðir. Við teknisku menningini verður helst neyðugt at endurnýggja alla upptøkuútgerðina komandi 2-3 árini.

FM-sendinetið hjá Útvarpi Føroya er 24 ára gamalt, og neyðugt verður at endurnýggja tað. Telefonverkið metir, at tað fer at kosta einar 3-4 milliónir krónur.

Tað var ein stórhending, tá nýggja Listasavnið lat upp í summar. Danskir grunnar, landsstýrið og Tórshavnar kommuna fíggjaðu nýggja bygningin.

Hølisviðurskiftini hjá Føroya Fornminnisavni eru ov vánalig og trong til størri framsýningar, og í ávísum førum enntá vandamikil. Arbeitt verður við at fáa savninum hóskandi karmar til framsýningar og goymslur.

Samstundis, sum vit fingu lóg um Føroya Landsskjalasavn, kom avtalan, sum landsstýrið gjørdi við danska forsætismálaráðið um skjølini hjá donskum stovnum í Føroyum. Nú hava allir stovnar skyldu at lata Landsskjalasavninum skjøl síni í varðveitslu.

Heilsumál

Sjúkrahúsverkinum hevur í fleiri ár verið álagt stórar sparingar, og ikki eru útlit til størri játtanir til heilsuverkið. Tí hevur landsstýrið í samstarvi við heilsumálaráðið sett ein sakkønan ráðgevingarbólk at greina heilsuverkið. Arbeiðssetningur bólksins er eitt nú at lýsa og meta um uppgávubýtið millum tey trý sjúkrahúsini, millum føroyska sjúkrahúsverkið og

Ríkissjúkrahúsið, millum primeru heilsutænastuna og sjúkrahúsverkið og at lýsa og meta um leiðslubygnaðinum í føroyska sjúkrahúsverkinum. Arbeiðið verður væntandi liðugt um mánaðarskiftið september/oktober.

Konsulentskipan er fingin í lag við Ríkissjúkrahúsið, so krabbameinssjúlingar nú kunnu fáa partar av viðgerðini á Landssjúkrahúsinum. Slík skipan fyri hæmodialysuviðgerð av nýrasjúklingum verður fyrireikað at fara í gongd í december.

Uppíbygningurin til Suðuroyar Sjúkrahús verður liðugur næsta heyst, men neyðugt verður at umbyggja gamla sjúkrahúsið eftir samanbindingina, fyri at heildin kann virka.

Fleiri stórar umvælingar og ábøtur eru sera átrokandi á Landssjúkrahúsinum, og verður tí at seta pening av til hetta. Støðan á Klaksvíkar sjúkrahús, er so mikið góð, at bert smávegis ábøtur eru neyðugar.

Eydnast at fáa semju við Sjúkrasystrafelagið at broyta lønarviðurskiftini hjá sjúkrasystranæmingum til eina stuðulsskipan, kunnu næmingar takast inn á sjúkrasystraskúlan 1. oktober.

Nýggj tilskotsskipan til heilivág er sett í verk, og tí minka útreiðslurnar hjá sjúkrakøssunum til heilivág og útreiðslur landskassans til sjúkrakassarnar. Landsstýrið hevur samtykt at minka um vinningin hjá apotekunum munandi, so dýrkanin ikki verður óneyðuga stór.

Vegna búskaparstøðuna hjá kommununum er landsstýrið tíverri ikki komið longri við ætlanini um, at børn undir 16 ár fáa ókeypis tannarøkt.

Landsstýrið arbeiðir við at gera eina nýggja skipan fyri skúlalæknatænastuna í Tórshavnar kommunu, soleiðis at allir kommunulæknarnir býta uppgávuna eftir sama býti sum fólk hava valt lækna.

Játtanin at viðgera rúsdrekkamisnýtarar er í verandi fíggjarlóg løgd undir heilsumál, og arbeiða Heilbrigdið og Blákrossheimið sum stovnar við fastari játtan. Dentur eigur at verða lagdur á at seta upplýsandi tiltøk í verk at fyribyrgja misnýtslu. Rusdrekka- og Narkotikaráðið eigur at verða ein natúrligur miðdepil í hesum arbeiði.

Íbúðarmál

Útlánsvirksemi Húsalánsgrunsins seinsta árið hevur verið merkt av varsemi. Nógv færri hús og íbúðir eru bygd. Fyri at bøta um fíggjarstøðuna hjá Húsalánsgrunninum samtykti løgtingið fyrr í vár lóg um avskriving av restkuld av lánum, sum Húsalánsgrunnurin hevði úr oljugrunninum.

Landsstýrið miðar ímóti at føra eina íbúðarpolitikk, so at verandi íbúðarhópur verður nýttur mest møguligt. Eins og undanfarin ár ætlar landsstýrið at seta ávisa peningaupphædd til Húsalánsgrunnin á fíggjarlógini komandi ár.

Almannamál

Á røktarheimsøkinum heldur skipanin við eindarprísi fram, og hevur Almannastovan skotið upp, at hann verður settur til kr. 920.- um dagin fyri búfólkið í 1994, og svarar hetta til støðið í 1993.

Væntandi verða røktarheimini í Sandoynni tikin í nýtslu fyrst í komandi ári. Reynt verður at finna ein alternativan rakstur, so tey mest røktarkrevjandi kunnu búgvan heima á Sandi, meðan heimini í Skopun og Skálavík verða meira lík sambýlinum í Húsavík, ið skuldu givið ein bíligari rakstrarbátt enn tann, vit kenna.

Sambýlið í Húsavík heldur fram, til røktarheimini lata upp. Arbeitt verður ímóti at seta á stovn sambýli í Norðurstreymoy. Tó verða tey mest røktarkrevjandi úr hesum øki visiterað til røktarheimið í Vágunum.

Munandi sparingar eru framidar á dagstovnaøkinum í ár í sambandi við ásetan av eindarprísi. Væntandi letur ein dagstovnur upp í Sørvági í heyst, og letur tí Daljanstova í Sandavági aftur.

Vardi verkstaðurin í Runavík letur upp 15. august. Seinni í ár verður búfelagsskapur fyri evnaveik í Runavík tikin í nýtslu.

Við broytingini í § 32 í forsorgarlógini ber til, at stovnar undir Andveikraverndini og aðrir stovar verða lagdir um til sambýli, har tann einstaki við síni pensjón er við til at fíggja raksturin.

Dagheimið á Berjabrekku verður tikið í nýtslu fyrst í september. Ætlanin er at fara undir eitt bútilboð til evnaveik í Suðuroy komandi ár, og verður hesin búfelagsskapur helst lagdur í Vági. Eisini eru fýra børn flutt á Autistaheim í Havn.

Samanlegging av heilsu- og heimasjúkrasystraskipanini og heimahjálpini fer at geva fyrimunir, tí skipanirnar viðvíkja ofta somu fólkum. Eisini gevur hetta møguleikar fyri at raðfesta uppgávurnar. Ein stýringsbólkur fer fyrireikingarnar til endaligu samanleggingina.

Kærunevnd í almannamálum kann fara undir virki sítt. Kærur, innkomnar eftir 1. apríl í ár, avgreiðir nevndin.

Tann 1. juli vórðu øll endurgjøld úr Danmark til almannaveitingar løgd í eina heildarveiting. Við ætlaðu rammulógini frá 1. januar 1994 kann alt lógargrundarlagið á almannaøkinum verða løgtinslógir.

Miðfyrringin av almannaumsitingini gongur sum ætlað. Fleiri stavsfólk eru flutt frá høvuðsdeildini og øktar heimildir eru givnar deildinum í Eysturoy, Norðoyggjum og í Suðuroy.

Endurbúgvingarstovan og heilsu- og heimarøktin eru nú lagdar undir Almannastovuna, og eru ætlanir at hava somu skipan fyri Andveikraverndina.

Bygnaðurin á Hjálpatólamiðstøðini verður broyttur.

Kommunumál

Kommununar eru illa fyri fíggjarliga. Tann kommunala lánsskuldin er 1,7 mia. kr., skattainntøkurnar hjá kommununum eru 539 mió. kr. Tølini fyri 1988 vóru ávikavist 1,2 mia. kr. og 649 mió. kr. Kommununar eru, sæð undir einum, ikki førar fyri at rinda vanligan rakstur og rentur og avdráttir av lánum, hóast fleiri kommunur í ár hækkaðu skattaprosentið, onkrar munandi.

Landsstýrið er um at verða liðugt við at gera eitt nágreiniligt yvirlit yvir støðuna hjá kommunum.

Landsstýrið fer í næstum at boða teimum kommunum, sum eru ringast fyri einar 10-12 kommunur - til fundar, kanska saman við peningastovninum, fyri at vita um ein loysn er at finna. Men landsstýrið hevur eisini boðað frá, at nøkur beinleiðis fíggjarlig hjálp úr landskassanum verður ikki veitt kommunum.

Í mars mánaða fekk kommunuarbeiðsnevndin boð frá landsstýrinum at halda fram eftir arbeiðssetninginum um, at uppgáva og ábyrgdarbýti millum land og kommunur skjótast gjørligt verður skipað eftir, at kommununar verða lagdar saman í størri eindir, sum nevndin hevur mælt til. Landsstýrið hevur avgjørt fyribils at støðga nevndararbeiðinum, til politiski myndugleikin hevur tikið støðu til spurningin, um arbeiðið skal halda fram, møguliga við broyttum arbeiðssetningi og aðrari samanseting av arbeiðsnevndini.

Landsstýrið er í ferð við at gera uppskot um broytingar í kommunustýrislógini. Tað er serliga viðvíkjandi fíggjar- og roknskaparviðurskiftunum hjá kommununum og reglur um viðurskiftini millum kommunu og vinnulív.

Samferðsla og samskifti

Íløgur í vegir og tunlar, havnir og ferjulegur eru munandi skerdar tey seinastu árini. Játtanin í 1991 var tilsamans 301 mió. kr., í 1992 241 mió. kr. og í 1993 165 mió. kr. Flest allar tær dýru íløgurnar í samferðslukervið eru um at vera lidnar. Sumbiartunnilin verður væntandi liðugur seinast í 1994.

Í 1992 vórðu Samferðslustovan og Strandfarskip Landsins løgd saman. Játtanin á fíggjarlógini fyri 1993 var 28 mió. kr. Til sammetingar kann nevnast, at játtanin fyri 1992 var 51 mió. kr., og tá grannskoðaður roknskapur varð gjørdur, vísti tað seg, at hallið fyri 1992 gjørdist góðar 60 mió. kr. Við øðrum orðum varð játtanin skorin niður í helvt frá einum fíggjarári til annað. Tað er eyðsæð, at slíkur niðurskurður merkist, fyrst og fremst við einari munandi skerdari ferðaætlan.

Landsstýrið fylgir við gongdini og kunnar stovnsleiðslan um fíggjarstøðuna.

Bæði farma- og ferðafólkatalið á rutuni millum Føroyar og Skotland er økt munandi.

Løgtingssamtyktin um Atlantsflog, ið varð gjørd í seinastu tingsetu, har m.a. veðhaldsskylda landskassans uppá 75 mió. kr. varð umløgd til partapening. Landsstýrið eigur nú allan partapeningin í felagnum. Leiðsla felagsins hevur við ymiskum tiltøkum lagað virksemið til tær

broyttu og verru tíðirnar. Ætlanina at fara at byggja uppí terminalin á flogvøllinum hevur landsstýrið tikið uppaftur. Væntandi verður málsviðgerðin liðug í heyst.

Telefonverkið er eisini merkt av vánaligu fíggjarviðurskiftunum. Eftir at allar útreiðslur eru goldnar og fullar avskrivingar tiknar við, er avlopið fyri 1992 góðar 12 mió. kr., avlopið fyri 1993 mett til góðar 3 mió. kr., og avlopið fyri 1994 einar 6-7 mió. kr.

Hóast eingi nýggj lán eru tikin í seks ár, so verður framhaldandi neyðug fløga gjørd. Henda nýgerð verður øll fíggjað um raksturin. Størsta arbeiðið í løtuni er uppá nýggja transatlantiska kaðalin, CANTAT 3.

Rakstarhall postverksins verður munandi minni í ár enn árini frammanundan. Í 1990 var hallið 20 mió. kr., í 1991 13,5 mió. kr. og í 1992 millum 8 og 9 mió. kr. Í ár verður hallið einar 4-5 mió. kr. Málið er at fáa javnvág í raksturin í 1994.

Umhvørvismál

Landsstýrið fer í næstum at taka støðu til, hvussu umhvørvisverndarlógin verður at umsita. Partar av umhvørvisverndarlóginí, herundir eftirlit á staðnum, eigur at liggja hjá kommununum. Regluskapandi arbeiði hørfturímóti, yvirumsjón og eftirlit við serliga dálkandi virkjum, eigur at liggja hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni ella øðrum landsstovni. Higartil hevur Heilsufrøðisliga starvsstovan røkt meginpartin av uppgávunum eftir umhvørvisverndarlóginí.

Orkumál

Oljunýtslan í 1992 var 2,5% minni enn í 1991, og er tað heldur størri minking enn frá 1990 til 1991. Minkingin stavar frá eini nógv minni nýtslu til skip, og var nýtslan á landi heldur meira enn í 1991.

Eisini elnýtslan minkaði, men ikki so nógv sum oljan. Minkingin var 1,8% í mun til 1991. Men av tí at árið var serliga vánaligt, er ongantíð fyrr framleitt so nógv el við vatni sum í 1992, og var økingin 12% í mun til 1991. Býtið millum vatn- og dieselframleitt el var 42% vatn og 58% diesel.

Eingin orkuútbygging er í løtuni; men í vár setti SEV eina vindmyllu upp í Neshaga, og hevur hon roynst væl.

IWC, NAMMCO ogg grindin

Aftur í ár sóu vit á ársfundi í altjóðahvalaráðnum - IWC - at grindadráp verður viðgjørt á politiskum stigi og ein viðtøka samtykt ímóti okkum.

Tíðin er helst komin at endurskoða okkara lut í donsku sendinevndini og limaskap Føroya í IWC.

Hinvegin er gott samstarv í nýggja felagsskapinum fyri umsiting av havsúgdjórum í Norðuratlantshavinum - NAMMCO. Bæði vísindanevnd og umsitingarnevnd eru valdar og fóru til verka eftir stovnandi fundin í Tórshavn í september.

Vit vænta okkum gott samstarv við hini limalondini í NAMMCO - Grønland, Ísland og Noreg - í einum felagsskapi, har ið umsitingaravgerðir eru grundaðar á besta visindatilfar.

Tá ið skrivstovan er stovnað í Tromsø í september, er alt klárt til at halda fram við tí góða og týdningarmikla arbeiðnum - ikki minst at halda fram við grindakanningum og ætlanini um aftur eina stóra norðatlantiska hvalateljing í 1995.

Norðurlandasamstarvið

Hóast langt er á mál, til vit hava vunnið fullan limaskap í norðurlandasamstarvinum, so er tó okkurt, ið ber á rætta borðið.

Tá samstarvið - undir leiðslu forsætisráðharranna - varð umskipað, komu stjórnarleiðararnir í Føroyum, Álandi og Grønlandi meira við í samstarvið í forsætisráðharraráðnum.

Vit eru umboðað í norrønu samstarvsnevndini, sum undir leiðslu forsætisráðharra og samstarvsráðharra, fyrisitur norðurlandasamstarvið.

Játtanin til samstarvið varð umskipað í 1992. Tey komandi árini verður meira játtað til mentan, undirvísing og gransking. Longu í 1996 skulu partar av samstarvinum fáa helvtina av árligu játtanini. Játtanin til norðurlandasamstarvið er í ár 650 mió. kr.

Hesa broyting kunnu vit bert fegnast um. Hetta er eitt samstarvsøki, har vit serliga eru við í.

Samvinna við Ef, EFTA o.o.

Nýggir frihandilssáttmálar eru fignir í lag við EFTA-londini - Finnland, Ísland, Noreg og Svørriki - og verða væntandi sáttmálar undirskrivaðir við Eysturríki og Sveis í næstum.

Handilssáttmálin við EF reynist rímiliga væl. Avtalaða felagsnevndin sáttmálapartanna millum hevur regluligar fundir; men landsstýrið er vónsvikið av, at ov lítið kemur burtur úr hesum fundum og umhugsar at fara til donsku stjórnina, so samráðingararbeiðið kann leggjast í eina legu, sum ætlanin var, tá ið sáttmálin varð undirskrivaður.

Landstýrið fylgir neyvt við arbeiðinum í EF og EFTA at skipa ein EØS-sáttmála, tí mett verður, at hesin sáttmálin kann fáa stórt og vónandi positivt árin á EØS-londini.

Undirgrundin

Tann 1. september í fjør varð semja gjørd millum landsstýrið og ríkistjórnina um, at málsøkið ráevni í undirgrundini varð føroyskt sermál. Við hesi søguligu semju, sum var undirskrivað í Tórshavn 22. december 1992 og góðkend á løgtinginum 4. mai í ár, endaði eitt langt stríð millum heimastýrið og donsku stjórnina.

Landsstýrið setti longu í december 1992 nevnd, oljuráðleggingarnevnd landsstýrisins, at vera landsstýrinum til hjálpar at gera eitt verklag til umsitingar av tilfeinginum í undirgrundini, og handaði nevndin landsstýrinum frágreiðing sína tann 25. juni í ár.

Landsstýrið fer helst í hesi tingsetu at leggja uppskot til samtyktar fyri løgtingið um, at føroyingar ætla sær at loyva leiting eftir olju og gjarðgassi í undirgrundini og uppskot til løgtingslóg um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya. Ælanin er eisini at halda fram við at gera verklag fyri økið; men endalig støða er ikki tikin til, hvussu hetta skal gerast.

Ein stórur óloystur spurningur í undirgrundarmálinum er landgrunsmarkið við Bretland. Samráðingar hava verið millum bretar øðumegin og føroyingar og danir hinumegin um at finna eina loysn, men ongan veg er gingist.

Í samband við at vit yvirtóku undirgrundina, skeyt danska uttanríkisráðið upp, at føroyingar tóku yvir leiðsluna í donsk-føroysku nevndini, sum samráðist við bretar um langrundsmarkið. Nevndin skal tó virka undir somu treytum sum higartil innan ríkisfelagsskapin. Fundur verður við bretar í oktober, og hevur tað største týdning fyri okkum at fáa loyst hetta mál, um føroyingar skulu fara undir oljuvinnu.

Stýrisskipan

Seinastu tíðina hava nógvar atfinningar verið at stýrisskipan okkara. Serstakliga hevur verið funnist at, at ov nógv samanblanding er av lóggevandi og útinnandi valdinum, og tað tí mangan er ógreitt, hvør hevur ábyrgdina av tiknum avgerðum.

Landsstýrið setti í vár nevnd við tí setningi at kanna og lýsa stýrisskipanina og at gera uppskot um nýggja stýrisskipanarlóg. Nevndin skal verða liðug við arbeiðið innan 1. oktober.

Tá nýggj landsstýrissamgonga varð skipað í apríl mánaði varð samstarvsavtala gjørd millum teir tríggjar flokkarnar, sum nú eru í samgongu. Í seinasta punkti í samstarvsavtaluni stendur: "Stýrisskipanin verður broytt við støði á álitinum, sum nevndin, ið er sett at kanna stýrisskipanina, leggur fram í seinasta lagi 1. oktober 1993. Ríkisrættarligu viðurskiftini Danmarkar og Føroya imillum verða broytt, so at føroyingar fáa fult lóggávu- og umsitingarvald yvir samfelagnum."

Við grundarlagi í hesum arbeiðssetningi og í arbeiðnum frá stýrisskipanarnevndini ætlar landsstýrið at leggja uppskot fram um nýggja stýrisskipan fyri Føroyar.

Landsstýrið vil hava, at hetta uppskot fær eina gjølliga politiska viðgerð á løgtingi, so at eitt samt løgting kann taka undir við tí lóggávu, sum samfelag okkara skal verða stýrt eftir.

Samvinnan við danskar stjórnir

Seinasta árið hevur verið stórt virksemi í samvinnuni millum landsstýrið og donsku stjórnina.

Umframt vanliga samstarvið í samband við sáttmála við útlond, eru síðan seinastu ólavsøku fleiri stórar broytingar hendar í samvinnu Føroya og Danmarkar millum.

Yvirtøkan av undirgrundini, føroyska leiðslan í donsk-føroysku landgrunssamráðingarnevndini og umlegging av sosialu veitingunum í heildarveitingini eru stórar og kollveltandi broytingar. Afturat hesum kemur so virksemið og avtalurnar,ið gjørdar vórðu í samband við figgjartrupulleikarnar í samfelagnum.

Síðani avtalurnar, sum danska stjórnin og Føroya Landsstýri gjørdu 6. oktober 1992, 1. februar og 28. mai 1993, hevur nógv verið tosað um, hvørja ávirkan tær hava á okkara frælsi at taka avgerðir í øllum málum.

Eru krøvini, sum sett verða í hesumm avtalum um fíggjarlógina, IMF-serfrøðingar, vinnulívslógir og bygnaðarnevnd órímilig, og hvørja ávirkan hava hesi á samfelag okkara?

Kravið frá 6. oktober 1992 um javnvág á fíggjarlógini hevði við sær, at fíggjarlógin varð tøvd hálva miljard.

Útreiðslurnar vórðu skerdar, og skattabyrða borgarans vaks. Hetta hevur havt við sær, at búskaparliga virksemið er vorðið minni enn mett varð frammanundan.

Enduruppbyggingarskráin frá IMF-serfrøðingunum tykist heldur ikki at hava verið til stóra nyttu, tí einastu ráð vóru upp aftur størri fíggjarligar skerjingar enn tær, ið longu eru gjørdar. Sitandi danska stjórnin hevur eisini slept hesi treyt.

At gera vinnulívslóggávuna nútímans var neyðugt, um vit skuldu rokna Føroyar sum nútíðarsamfelag.

Hvønn týdning, arbeiðið hjá bygnaðarnevndini fær, sæst í næstu framtíð. Hinvegin hevur landsstýrið givið tilsøgn um, at tað ætlar í fiskivinnupolitikki sínum at fylgja tí stevnu, nevndin kemur við.

Í sambandi við fíggjartrupulleikarnar í Føroyum hevur danski statsministarin sett trímanna serfrøðinganevnd, mannað við fólki uttan fyri umsitingina, at ráðgeva sær. Nevndin skal vera liðug við arbeiði sítt í seinsta lagi 31.12.1993; men longu í september kemur hon við einum ávegisáliti.

Føroya Landsstýri hevur eisini sett eina líknandi trímannanevnd, og skal føroyska nevndin vera liðug við arbeiði sítt samstundis sum danska nevndin.

Eingin ivi er um, at hesar avtalur hava havt ávirkan á føroyska samfelagið, men hava tær skert frælsið og rættindi okkara?

Tað er nú einaferð so, at tá ið tú skyldar pening, noyðist tú at ganga undir tær treytir, sum lángevarin setir tær, og her kann leggjast aftrat, at ikki er væntandi, at annar lángevari hevði sett linari treytir. Tað er tí eyðsæð, at virkismøguleikar føroyinga eru skerdir í hesum døgum.

Vit kunnu siga, at vit seinasta árið á ein hátt eru vorðin meira heft at dønum av teimum stóru lántøkunum; men samstundis hava vit á øðrum økjum fingið nógv meira at siga sjálv.

Rætta leiðin er eisini hon, at vit verða før fyri sjálvi at taka avgerð í øllum málum.

Framtíðarútlit

Hvussu eru so útlitini fyri komandi árið? Fer at bera til at minka um arbeiðsloysið, at steðga fólkaflytingini úr Føroyum og at venda mótloysinum, ið nú valdar, til áræði og virksemi.

Jú, í allari neyðini eru tó ymiskir glottar fyri framman, ið kundu bent á broytingar til tað betra.

Við umstruktureringini og fíggjarligu saneringi av vinnuni á sjógvi og landi verða nú skapaðar fyritreytir fyri sunnum vinnulívi, ið kann bera seg á handilsligum grundarlagi, og um rætt veður atborið, ber til at fáa fleiri fólk í arbeiði í fiskivinnuni.

Nú veiðunøgdin um Føroyar framvegis fellur, er tó ein lítil glotti á fiskiveiðiøkinum, at fiskiskapurin á fjarliðunum hevur verið góður, og at nýggjar fiskileiðir eru funnar.

Fíggjarviðurskiftini hava eisini útlit fyri at ganga rætta vegin. Í avtaluni millum landsstýrið og donsku stjórnina frá 28. mai hava vit fingið ein tryggleika á hesum økinum, sum vit ikki hava havt seinasta árið. Fígging er fingin til undirskot á fíggjarlógini, og vissa er fingin fyri tryggleikanum í peningastovninum.

Fyri tey, sum hava starvast í byggivinnuni í tænastvinnuni og í umsitingini, eru útlitini fyri nýggjum arbeiðslássum ikki góð beint nú.

Nøkur teirra mugu í eina tíð royna at finna sær arbeiði uttan fyri landoddanar, men vónandi kunu tey aftur fáa arbeiði í Føroyum um ikki alt ov langa tíð. Hetta kann m.a. henda, um vit fáa fleiri arbeiðspláss innan nýggjar tænastuvinnur og møguliga eisini oljuvinnuna.

Politiska uppgávan er at skapa tær neyðugu fortreytirnar fyri, at hesar vinnur kunna mennast. Landsstýrið kann eisini vera við til at stuðla uppbygging og neyðuga umskúling av fólki.

Tey búskaparligu útlitini sum heild tykjast at benda tann vegin, at niðurgongdin í samfelagnum er um at steðga, og at vit fara at ganga niðan brekku aftur; men leiðin er long og brøtt og strævin.

Samgonga og samstarv

Í hesi sera torførru tíð er neyðugt meira enn nakrantíð, at vit- flokkarnir, ið hava átikið okkum at stýra, standa saman um at loysa vandamálini og lata seráhugamál, sum hvør flokkur sær hevur, liggja, elva tey til ósemjur, sum eigur at verða nýtt til at loysa tað, sum veruliga trokar á.

Tað kann tí væl henda, at tann einstaki veljarin gerst ónøgdur við, at flokkurin, hann ella hon valdi, ikki nýtir orku til júst tað mál, sum hann ella hon helt vera tað týdningarmesta; men sum støðan er, mugu seráhugamálini, har tað er neyðugt, víkja fyri at bjarga samfelagnum.

Flestu løgmansrøðurnar enda við, at samgongan bjóðar andstøðuni til samstarv. Men ofta er tað so, at tá ein samgonga er skipað, er so sum so við, hvussu stóra ávirkan andstøðuflokkarnir hava. Eg fari kortini at bjóða til samstarv og fari at biðja andstøðuna taka hesa innbjóðing í størsta álvara.

Eg fari serliga at nevna hesi mál: Oljuvinnuna, fiskivinnuna og stýrisskipanina. Tær avgerðir, vit taka í hesum málum, hava so stóran týdning og so stóra ávirkan á framtíðina, at tær eiga at verða tiknar við so stórari undirtøku í løgtinginum sum gjørligt og ikki bert av seytjan tingmonnum.

FARLOYVI

Ár 1993, hósdagin 29. juli varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at Jóhannes Ellefsen skuldi taka sæti á tingi fyri Frank Davidsen, sum í skrivi bað um farloyvi vegna sjúku.

14. september varð við 21-0 atkvøðum samtykt, at Hans Tausen Olsen skuldi taka sæti á tingi fyri Signar á Brúnni, sum í skrivi bað um farloyvi meðan hann var landsstýrismaður eila til hann skrivliga boðar frá, at hann aftur tekur sæti á tingi.

14. september varð við 21-0 atkvøðum samtykt, at Hildur Patursson skuldi taka sæti á tingi fyri Finnboga Ísakson, sum í skrivi bað um farloyvi meðan hann var landsstýrismaður ella til hann skrivliga boðar frá, at hann aftur tekur sæti á tingi.

14. september varð við 21-0 atkvøðum samtykt, at Dan Petersen skuldi taka sæti á tingi fyri Jørgen Thomsen, sum í skrivi bað um farloyvi vegna sjúku.

21. september varð við 21-0 atkvøðum samtykt, at Jens Nordberg skuldi taka sæti á tingi fyri Hergeir Nielsen, sum í skrivi bað um farloyvi meðan hann var burturstaddur í almennum ørindum. Jens Nordberg var triði valdi eftir Dan Nielsen, sum í skrivi 20. september boðaði frá, at hann ikki kundi møta.

26. oktober varð við 20-0 atkvøðum samtykt, at Bjarni Djurholm skuldi taka sæti á tingi fyri Óla Breckmann, sum í skrivi bað um farloyvi meðan hann var burturstaddur í almennum ørindum.

26. oktober varð við 20-0 atkvøðum samtykt, at Sommer Winther skuldi taka sæti á tingi fyri Atla P. Dam, sum í skrivi bað um farloyvi meðan hann var burturstaddur í almennum ørindum.

26. oktober varð við 20-0 atkvøðum samtykt, at Dan Petersen skuldi taka sæti á tingi fyri Jørgen Thomsen, sum í skrivi bað um farloyvi vegna heilsuviðgerð.

26. oktober varð við 20-0 atkvøðum samtykt, at Heri Joensen skuldi taka sæti á tingi fyri Asbjørn Joensen, sum andaðist 21. oktober.

28. oktober varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at Eyðálvur Dimon skuldi taka sæti á tingi fyri Jacob Lindenskov, sum í skrivi bað um farloyvi meðan hann var burturstaddur í almennum ørindum.

3. november varð við 21-0 atkvøðum samtykt, at Manne Næs skuldi taka sæti á tingi fyri Henrik Old, sum í skrivi bað um farloyvi vegna burturferð. Manne Næs var triði valdi eftir Marner Lisberg, sum eisini hevði biðið um farloyvi.

16. november varð við 21-0 atkvøðum samtykt, at Manne Næs skuldi taka sæti fyri Mikkjal Sørensen, sum í skrivi bað um farloyvi vegna sjúku. Manne Næs var triði valdur eftir Marner Lisberg, sum í skrivi boðaði frá, at hann ikki kundi møta.

21. november varð við 21-0 atkvøðum samtykt, at Leivur í Bø skuldi taka sæti fyri Niels

Paula Danielsen, sum í skrivi bað um farloyvi vegna sjúku.

21. november varð við 21-0 atkvøðum samtykt, at Eyðálvur Dimon skuldi taka sæti á tingi fyri Atla P. Dam, sum í skrivi bað um farloyvi meðan hann var burturstaddur í almennum ørindum.

23. november varð við 27-0 atkvøðum samtykt, at Jógvan við Keldu skuldi taka sæti á tingi fyri Anfinn Kallsberg, sum í skrivi bað um farloyvi.

23. november varð við 27-0 atkvøðum samtykt, at Páll Josefsen skuldi taka sæti á tingi fyri Karl Hera Joensen, sum í skrivi bað um farloyvi vegna sjúku.

2. december varð við 25-0 atkvøðum samtykt, at Bjarni Djurholm skuldi taka sæti á tingi fyri Óla Breckmann, sum í skrivi bað um farloyvi meðan hann var burturstaddur í almennum ørindum.

2. december varð við 25-0 atkvøðum samtykt, at Agnar Nielsen skuldi taka sæti á tingi fyri Terja Davidsen, sum í skrivi bað um farloyvi meðan hann var burturstaddur í egnum ørindum.

Ár 1994, týsdagin 1. februar varð við 18-0 atkvøðum samtykt, at Jógvan við Keldu skuldi taka sæti á tingi fyri Anfinn Kallsberg, sum í skrivi bað um farloyvi vegna sjúku.

1. februar varð við 18-0 atkvøðum samtykt, at Leivur í Bø skuldi taka sæti á tingi fyri Niels Paula Danielsen, sum í skrivi bað um farloyvi meðan hann var burturstaddur í egnum ørindum.

8. februar varð við 18-0 atkvøðum samtykt, at Bjarni Djurholm skuldi taka sæti á tingi fyri Óla Breckmann, sum í skrivi bað um farloyvi meðan hann var burturstaddur í fólkatings-ørindum.

28. februar varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at Jógvan við Keldu skuldi taka sæti á tingi fyri Anfinn Kallsberg, sum í skrivi bað um farloyvi vegna sjúku.

28. februar varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at Sonnner Winther skuldi taka sæti á tingi fyri Atla P. Dam, sum í skrivi bað um farloyvi meðan hann var burturstaddur í almennum ørindum.

28. februar varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at Bjarni Djurholm skuldi taka sæti á tingi fyri Óla Breckmann, sum í skrivi bað um farloyvi meðan hann var burturstaddur í almennum ørindum.

18. mars varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at Eyðun Viderø skuldi taka sæti á tingi fyri John Petersen, sum í skrivi bað um farloyvi meðan hann var burturstaddur í egnum ørindum.

21. mars varð við 18-0 atkvøðum samtykt, at Agnar Nielsen skuldi taka sæti á tingi fyri Terja Davidsen, sum í skrivi bað um farloyvi meðan hann var burturstaddur í egnum ørindum.

21. mars kom umsókn um farloyvi frá Lisbeth L. Petersen meðan hon var burturstødd. Næsti maður á listanum Heðin Mortensen var burturstaddur og hevði ikki biðið um farloyvi og tí kundi ikki atkvøðast um, at Eilif Samuelsen, sum var næsti maður eftir hann, kundi taka sæti á tingi.

23. mars kom skriv frá Lisbeth L. Petersen, har umbøn hennara um farloyvi, sum ikki varð sett undir atkvøðugreiðslu og sostatt ikki gingin á møti, varð afturtikin.

23. mars varð við 20-0 atkvøðum samtykt, at Mamy Dahl Sørensen skuldi taka sæti á tingi fyri Vilhelm Johannesen, sum í skrivi bað um farloyvi vegna sjúku.

25. mars varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at Bjarni Djurholm skuldi taka sæti á tingi fyri Óla Breckmann, sum í skrivi bað um farloyvi meðan hann var burturstaddur í fólkatingsørindum.

7. apríl varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at Manne Næs skuldi taka sæti á tingi fyri Mikkjal Sørensen, sum í skrivi bað um farloyvi. Manne Næs var triði valdi eftir Marner Lisberg, sum í skrivi boðaði frá, at hann ikki kundi møta.

12. apríl varð við 19-0 atkvøðum samtykt, at Sommer Winther skuldi taka sæti á tingi fyri Atla P. Dam, sum í skrivi bað um farloyvi meðan hann var burturstaddur í almennum ørindum.

12. apríl varð við 19-0 atkvøðum samtykt, at Dan Petersen skuldi taka sæti á tingi fyri Jørgen Thomsen, sum í skrivi bað um farloyvi vegna sjúku.

27. apríl varð við 18-0 atkvøðum samtykt, at Sommer Winther skuldi taka sæti á tingi fyri Atla P. Dam, sum í skrivi bað um farloyvi meðan hann var burturstaddur í fólkatingsørindum.

4. mai varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at Jóngerð Purkhús skuldi taka sæti á tingi fyri Hildur Patursson, sum í skrivi bað um farloyvi vegna burturferð.

9. mai varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at Jens Nørðberg skuldi taka sæti á tingi fyri Hergeir Nielsen, sum í skrivi bað um farloyvi meðan hann var burturstaddur í almennum ørindum. Jens Nørðberg var triði valdi eftir Dan Nielsen, ið segði frá, at hann ikki kundi møta.

17. mai varð við 27-0 atkvøðum samtykt, at Jákup Lamhauge skuldi taka sæti á tingi fyri Jógvan I. Olsen, sum í skrivi bað um farloyvi vegna burturferð. Jákup Lamhauge var triði valdi eftir Johs. Martin Olsen, ið var fluttur av landinum.

17. mai varð við 27-0 atkvøðum samtykt, at Agnar Nielsen skuldi taka sæti á tingi fyri Terja Davidsen, sum í skrivi bað um farloyvi vegna burturferð.

19. mai varð við 28-0 atkvøðum samtykt, at Súni í Hjøllum skuldi taka sæti á tingi fyri Hans Tausen Olsen, sum í skrivi bað um farloyvi vegna sjúku.

28. juni varð við 24-0 atkvøðum samtykt, at Sommer Winther skuldi taka sæti á tingi fyri

Jacob Lindenskov, sum í skrivi bað um farloyvi vegna burturferð.

TINGNEVNDIR

Fastar tingnevndir valdar 3. august 1993.

Fíggjarnevndin:
Fastir limir:
Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Asbjørn Joensen, Hergeir Nielsen, Finnbogi Arge, Anfinn Kallsberg og Tordur J. Niclasen.

Tiltakslimir:
Sverre Midjord, Heini Johansen, Helena Dam á Neystabø, Heini O. Heinesen, Flemming Mikkelsen, Birgir Danielsen og Olaf Olsen.

Fiskivinnunevndin:
Fastir limir:
Heini O. Heinesen, Jógvan A. Johannessen, Henrik Old, Asbjørn Joensen, John Petersen, Niels Pauli Danielsen og Jógvan I. Olsen.

Tiltakslimir:
Hergeir Nielsen, Frank Davidsen, Atli P. Dam, Helena Dam á Neystabø, Olaf Olsen, Anfinn Kallsberg og Terje Davidsen.

Marknaðarnevndin:
Fastir limir:
Hergeir Nielsen, Sverre Midjord, Atli P. Dam, Helena Dam á Neystabø, Olaf Olsen, Birgir Danielsen og Edmund Joensen.

Tiltakslimir:
Heini O. Heinesen, Jørgen Thomsen, Heini Johansen, Asbjørn Joensen, Jógvan Sundstein, John Petersen og Flemming Mikkelsen.

Samferðslunevndin:
Lasse Klein, Heini Johansen, Jógvan A. Johannessen, Heini O. Heinesen, Svend Aage Ellefsen, John Petersen og Terje Davisen.

Rættarnevndin:
Mikkjal Sørensen, Hergeir Nielsen, Helena Dam á Neystabø, Birgir Danielsen og Lisbeth L. Petersen.

Skattanevndin:
Jacob Lindenskov, Heini O. Heinesen, Lasse Klein, Jógvan Sundstein og Finnbogi Arge.

Almanna- og heilsunevndin:
Asbjørn Joensen, Jacob Lindenskov, Heini O. Heinesen, Óli Breckmann og Lisbeth L. Petersen.

Mentannar- og skúlanevndin:
Hergeir Nielsen, Jógvan A. Johannessen, Helena Dam á Neystabø, Óli Breckmann og Terje Davidsen.

Landbúnaðarnevndin:
Mikkjal Sørensen, Heini O. Heinesen, Asbjørn Joensen, Birgir Danielsen og Terje Davidsen.

Ídnaðarnevndin:
Heini O. Heinesen, Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Olaf Olsen og Flemming Mikkelsen.

Umhvørvisnevndin:
Frank Davidsen, Heini O. Heinesen, Lasse Klein, Óli Breckmann og Terje Davidsen.

Arbeiðaramálanevndin:
Heini Johansen, Hergeir Nielsen, Asbjørn Joensen, Birgir Danielsen og Jógvan I. Olsen.

Landsstýrismálanevndin:
Hergeir Nielsen, Vilhelm Johannesen og Birgir Danielsen.

Norðurlandaráðið:
Fastir limir:
Jógvan A. Johannessen
Jógvan Sundstein

Tiltakslimir:
Hergeir Nielsen
Anfinn Kallsberg

Tingmannaráð Útnorðurs:
Fastir limir:
Henrik Old, Hergeir Nielsen, Helena Dam á Neystabø, Svend Aage Ellefsen, Niels Pauli Danielsen og Lisbeth L. Petersen.

Tiltakslimir:
Jørgen Thomsen, Heini O. Heinesen, Lasse Klein, John Petersen, Tordur J. Niclasen og Flemming Mikkelsen.

Onnur tingseta 1993

Ár 1994, mikudagin 20. juli varð løgtingið sett. Aldursforsetin Jákup Joensen, las upp skriv frá løgmanni, dagfest 18. juli 1994, har løgmaður eftir løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948, § 7, um stýrisskipan Føroya í sermálum stevnir løgtingsmonnum til tings, og lýsti tingsetuna fyri 1993 at vera setta (onnur tingseta).

Tingmenninir eru:

Norðoya valdømi:	Anfinn Kallsberg, Viðareiði, ff., Vilhelm Johannesen, Klaksvík, jv., Álvur Zachariassen, Klaksvík, sj., Heini O. Heinesen, Kunoy, tj.
Eysturoyar valdømi:	Kjartan I. Joensen, Leirvík, ff., Edmund Joensen, Oyrabakki, sb., Jógvan I. Olsen, Toftir, sb., Signar á Brúnni, Fuglafj., tj., Lasse Klein, Saltangará, krf., Tordur J. Niclasen, Eiði, mf., Óli Jacobsen, Tórshavn, vkf.
Norðstreymoyar valdømi:	Maria Hansen, Vestmanna, sb., Jógvan Durhuus, Vestmanna, tj.
Suðurstreymoyar valdømi:	Óli Breckmann, Tórshavn, ff., Bjarni Djurholm, Tórshavn, ff., Bjørn á Heygum, Tórshavn, sb., Lisbeth L. Petersen, Tórsh., sb., Finnbogi Arge, Tórshavn, sb., Marita Petersen, Tórshavn, jv., Helena Dam á Neystabø, Tórsh., sj., Finnbogi Ísakson, Tórshavn, tj., Jenis av Rana, Tórshavn, mf., Kristian Magnussen, Tórsh., vkf.
Vága valdømi:	Jørgen Niclasen, Sørvágur, ff., Ivan Johannesen, Miðvágur, sb.
Sandoyar valdømi:	John Petersen, Skopun, ff., Jógvan A. Johannessen, Skopun, jv.
Suðuroyar valdømi:	Jákup Joensen, Lopra, sb., Jóannes Eidesgaard, Tvøroyri, jv., Henrik Old, Vágur, jv., Jákup Olsen, Vágur, krf., Ingeborg Vinther, Vágur, vkf.

Formaðurin bað Ivan Johannesen og Henrik Old vera fyrlbils skrivarar.

Tá valbrøvini vóru góðkend. skipaði aldursformaðurin Jákup Joensen fyri vali av tingformanni og trimum næstformonnum eftir § 2. stk. 2, í tingskipanini.

Eftir uppskoti frá sambandsflokkinum varð Jógvan I. Olsen valdur til løgtingsformann. 1. næstformaður varð valdur Jógvan Durhuus. 2. næstformaður varð valdur Anfinn Kallsberg og 3. næstformaður varð vald Ingeborg Vinther.

Sambandsflokkurin skeyt upp at velja Ivan Johannesen til 1. skrivara og sum 2. skrivari varð valdur Henrik Old.

FARLOYVI

Ár 1994, 20. juli varð við 27-0 atkvøðum samtykt, at Petur Jacobsen skuldi taka sæti á tingi fyri Tord J. Niclasen, sum í skrivi bað um farloyvi vegna burturferð.

22. juli varð við 25-0 atkvøðum samtykt. at Karl Robert Johansen skuldi taka sæti á tingi fyri Óla Jacobsen, sum í skrivi bað um farloyvi vegna burturferð.

TINGNEVNDIR

Fastar tingnevndir valdar 20. juli 1994.

Fíggjarnevndin:
Fastir limir:
Finnbogi Arge, Ivan Johannesen, Anfinn Kallsberg, Tordur J. Niclasen, Lasse Klein, Vilhelm Johannesen og Jógvan Durhuus.

Tiltakslimir:
Bjørn á Heygum, Kristian Magnussen. Bjarni Djurholm, Jenis av Rana, Jákup Olsen, Jógvan A. Johannessen og Álvur Zachariassen.

Fiskivinnunevndin:
Fastir limir:
Jógvan I. Olsen, Jákup Joensen, Kjartan I. Joensen, John Petersen, Óli Jacobsen, Henrik Old og Heini O. Heinesen.

Tiltakslimir:
Maria Hansen, Lisbeth L. Petersen, Óli Breckmann, Bjarni Djurholm, Ingeborg Vinther, Álvur Zachariassen og Jógvan Durhuus.

Marknaðarnevndin:
Fastir limir:
Edmund Joensen, Jørgen Niclasen, Bjarni Djurholm, Jákup Olsen, Kristian Magnussen, Jógvan A. Johannessen og Helena Dam á Neystabø.

Tiltakslimir:
Bjørn á Heygum, Óli Breckmann, Kjartan I. Joensen, Jenis av Rana, Ingeborg Vinther, Vilhelm Johannesen og Finnbogi Ísakson.

---

20. juli legði løgmaður vegna landsstýrið fram tingmál nr. 207/1993 (onnur tingseta): Løgtingslóg um stýrisskipan Føroya.

25. juli bað formaðurin um tingsins loyvi at víkja frá tíðarfreistini til 2. viðgerð av tingmáli nr. 207/1993 (onnur tingseta): Løgtingslóg um stýrisskipan Føroya. Hetta varð givið uttan atkvøðugreiðslu.

25. juli bað formaðurin um tingsins loyvi at víkja frá tíðarfreistini til 3. viðgerð av tingmáli nr. 207/1993 (onnur tingseta): Løgtingslóg um stýrisskipan Føroya.

25. juli 1994 endaði Marita Petersen, løgmaður tingsetuna.

1 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1993, mikudagin 4. august legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1. Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar: Í § 33 nr. 11 verða "10.000 kr." broyttar til "20.000 kr." og "av lønarútreiðslum" broytt til "av lønarútreiðslum og av helvtini av tilfarskostnaðinum".

§ 2. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og er bert galdandi í 1993 og 1994.

lagtingslov om ændring i lagtingslov i landsskat og kommuneskat.

§ 1. I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer: I § 33, nr. 11 ændres "10.000 kr." til "20.000 kr." og "af lønudgifter" til "af løneudgifter og af halvdelen af materialeudgifter".

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen, og har kun gyldighed i 1993 og 1994.

Viðmerkingar

Eftir uppskoti frá landsstýrinum samtykti løgtingið í mai í ár at loyva sethúsacigarum at draga 10.000 kr. frá á sjálvuppgávuni fyri lønarútreiðslur til umvæling v.m. av sethúsum. Treytin fyri at fáa henda frádrátt var, at tann, sum gørdi arbeiðið, var MVG-skrásettur.

Endamálið við lógini var at geva sethúsacigarum betri møguleikar at halda sínar ognir vilíka, og at skapa møguleikar fyri, at fleiri innan tímbur- og handvrksvinnuna koma í arbeiði.

Líkt er tó ikki til, at lógin hevur virkað eftir ætlan. Bert fá fólk hava nýtt henda møguleika at umvæla húsini, hóast møguleikan at draga upp til 10.000 kr. frá á sjálvuppgávuni.

Møguliga er upphæddin ov lítil, og møguliga er tað skeivt, at ikki er loyvt at draga kostnaðin av tilfari frá, heilt ella partvíst.

Landsstýrið mælir tí nú til við hesi lógarbroyting at hækka tann loyvda frádráttin úr 10.000 kr. upp í 20.000 kr. um árið í 1993 og 1994 og at loyva at helvtin av tilfarskostnaðinum kann dragast frá í skattskyldugu inntøkuni.

1. viðgerð 4. august 1993. Málið varð beint í skattanevndina, sum 4. august 1993 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 4. august 1993 og eftir 1. viðgerð sama dag beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jacob Lindenskov, Lasse Klein, Heini O. Heinesen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Ein minniluti (Jógvan Sundstein) harmast um, at frádráttir aftur koma við í skattaskipanina og harvið forða fyri betri og rættvísari skattaskipan.

Møguliga hava nøkur enn ráð til at umvæla síni hús - men tað eru ikki tey við stórum rentuútreiðslum - og hetta kann í ein vissan mun geva nakað av arbeiði til handverksfyritøkur. Út frá tí møguliga arabeiðsskapandi í hesum - og bert tí - kann minnilutin góðtaka, at hesin frádráttur verður galdandi í 1993 og 1994.

Ein annar minniluti (Finnbogi Arge) tekur undir við uppskoti landsstýrisins um at geva sethúsaeigarunum loyvi til at draga 20.000 kr. frá á sjálvuppgávuni fyri lønar- og tilfarskostnað í sambandi við umvæling av sethúsum og íbúðum.

Minnilutin vísir á, at sambandsflokkurin í seinastu tingsetu legi fram uppskot til samtyktar í løgtingsmáli nr. 185/92: Tiltøk at hjálpa teimum, ið sita við ovurhøgum sethúsa- og íbúðalánum - sum grundleggjandi bøtir um støðuna hjá teimum seusacigarum, ið eru fangaðir í eini skuldarfellu. Uppskotið fall, og verður tí aftur sett fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri tingið lógaruppskot, sum bøtir um støðuna hjá sethúsaeigarum, sum eru fangaðir í einari skuldarfellu og sita við ovurhøgum sethúsa- og íbúðarlánum. Hetta skal gerast við einum tíðarskipaðum fermetrafrádrátti ella við einum rentufrádrátti fyri tann partin av skuldini, sum liggur omanfyri tað støðið, sum landsstýrið metir vera gjørligt hjá sethúsaeigarum at forrenta m.a. orsakað av øktari skattabyrðu.

2. viðgerð 4. august 1993. Minnilutauppskotið fall við 10-0 atkvøðum. Samtykt at beina málið til 3. viðgerð við 24-0 atkvøðum.

3. viðgerð 4. august 1993. Uppskotið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

FL jnr. 2540-5/91.

Lóg nr. 158 frá 5. august 1993.

2 Broyting í fyriskipan um ígildissetan fyri Føroyar av lóg um partafeløg

Ár 1993, týsdagin 7. september legði Thomas Arabo, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at fyriskipan nr. 250 frá 3. mai 1993 um ígildissetan fyri Føroyar av lóg um partafeløg verður broytt, sum skotið upp av ídnaðarmálum.

Viðmerkingar

Við fyriskipan nr. 250 frá 3. mai 1993 var lóg um partafeløg sett í gildi fyri Føroyar við gildisdegi 1/1-1994.

Í sambandi við, at ríkisstjórnin og Føroya Landsstýri hava góðkent, at Føroya Banki og Sjóvinnubankin verða lagdir saman, er tað vorðið greitt, at eftir núverandi partafelagslóg (Lóg um partafeløg frá 15/4-1930), verður ein slík samanlegging sera drúgv og umsitingarliga trupul at fremja.

Bankarnir og Fíggingargrunnurin frá 1992 hava tí fyri ríkisstjórnini og Føroya Landsstýri skotið upp at seta gildisdagin fyri nýggju partafelagslógina til 15. september 1993, tó bert galdandi fyri bankarnar.

Reglur um samanlegging eru bæði í lógini frá 1930 og nýggju partafelagslógini. Stórur munur er á reglunum. Skjótt kann sigast, at broytingar í vinnulívsmynstrinum bæði í Føroyum og í útlondum hava skapt ein tørv fyri smidligari mannagongd í vinnulóggávuni til tess at fremja bygnaðarbroytingar bæði í vinnulívinum sum heild og á ávísum virkjum.

Hetta hevur fört við sær eina líðandi broyting í uppfatanini av tí skuldarviðurskifti, ið er ein partur av eini samanlegging.

1930-lógin hevur sum fyritreyt vanligu regluna í oguarrættinum, nevniliga at eitt slíkt ognarskifti krevur samtykki frá ognarunnm - tvs. at skuldin í tí felagnum, ið heldur uppat, í prinsippinum fellur til gjaldingar beinanvegin.

Nýggja lógin hevur sum fyritreyt, at tá ið talan er um samanlegging verður víkt frá hesari reglu, og loyvir hon eini sokallaðari "universal-succession" - tvs. at tað felagið, ið heldur fram, ella tað nýggja felagið yvirtekur fult og heilt rættindi og skyldur hjá felagnum/-feløgunum, ið heldur/halda uppat, og hevur sostatt skyldu til at taka ábyrgdina av teimum skyldum á sama hátt og til somu tíð, sum tað avtikna felagið hevði havt skyldu til, um tað enn var til.

Í hesum sambandi kann nevnast, at 1930-lógin krevur, at ognirnar hjá teimum báðum/øllum feløgunum, ið skulu leggjast saman, skulu umsitast hvør sær í 6 mánaðir frá tí, at samanlegging er fráboðað.

Nýggja lógin loyvir harafturímóti, at samanlagt verður beinanvegin við øllum rættindum og skyldum, um treytirnar í kapittul 15 eru loknar, og verður her serliga vist til treytina í § 134c, petti 4, har sagt verður, at metingarmenn skulu vátta, at ognararnir (kreditorarnir) í teimum samanløgdu feløgunum eru nóg væl tryggjaðir aftaná samanleggingina.

Mælt verður til, at lóg um partafeløg verður sett í gildi 15. september 1993, galdandi fyri bankarnar, sum skotið upp av ídnaðarmálaráðnum.

1. viðgerð 14. september 1993. Málið varð beint í rættarnevndina. Burturdottið vegna samgonguslit.

FL jnr. 620-6/93.

3 Fíggjarløgtingslóg 1994

Ár 1993, mikudagin 31. august legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

fíggjarløgtingslóg 1994

Sí skjal 1

Viðmerkingar:

Ásannandi, at stórur niðurskurður í rakstrar- og íløguútreiðslunum hjá tí almenna fara at gera ringar tíðir uppaftur verri og fáa samfelagið mestsum at steðga heilt upp, leggur landsstýrið fram uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri 1994, har roknað er við halli.

Á heysti í 1992 kravdi danska stjórnin sum treyt fyri lánveiting til landsstýrið, at fíggjarlógin 1993 skuldi javnviga. Á vári í 1993 varð gingið frá hesum kravi, tí framhaldandi afturgongd í búskapinum og stór effektiv veðhald gjørdu - partvíst saman við ov bjartskygdum metingum av fíggjarløgtingslógini - at ógjørligt var at fáa javnvág.

Roknað verður við, at fíggjarløgtingslógin fer at hava hall í eitt ávíst tíðarskeið, men vónandi verður gjørligt eftir rímiligari tíð at venda hallinum til avlop ella í minsta lagi javnvág. Ráðgevandi nevndin hjá forsættisráðnum hevur í sínari frágreiðing fyri 1993 ført fram, at hallið á fíggjarløgtingslógini eigur at minka so við og við.

Teir búskaparligu trupulleikarnir, sum Føroyar hava at dragast við í hesum árum, hava eisini havt við sær, at inntøkur landskassans av beinleiðis og óbeinleiðis skatti eru nógv minkaðar. Útreiðslurnar eru tí eisini skornar nógv niður tey seinastu 4-5 árini, bæði rakstrar- og íløguútreiðslur. Men hóast niðurskurðin er ikki í løtuni gjørligt at fáa javnvág í fíggjarlógina, um nøkur almenn íløga skal gerast yvirhøvur.

Umstøðurnar loyva ikki, at farið verður undir stórvegis nýggjar almennar íløgur. Tær íløgur, sum játtanir eru til á hesum uppskoti til fíggjarløgtingslóg, fara so at siga allar til arbeiði, sum eru í gongd.

Samstundis, sum inntøkur landskassans minka, falla stór lán, tey flestu tikin uttanlands, til gjaldingar.

Skulu sparingar av týdningi gerast aftrat á fíggjarlógini, verður neyðugt at fara undir langtíðarbroytingar av umsiting og tænastuøkjum. Tey trý málsøkini, sum standa fyri teimum størstu útreiðslunum, eru skúlaverkið, heilsuverkið og almannaverkið. Skulu bygnaðarbroytingar við sparingum fyri eyga gerast á einum ella fleiri av hesum málsøkjum, eigur løgtingið skjótast gjørligt at taka prinsipstøðu til broytingarnar. Landsstýrið fer møguliga at leggja uppskot fyri tingið til umrøðu hesum viðvíkjandi.

Stuðul til fiskivinnuna hevur verið ein tann størsta útreiðslan á fíggjarlógini, men umleggingin av fiskivinnuni, sum hevur verið og er í gongd, hevur havt við sær, at hesin stuðul er minkaður munandi. Tilsamans eru 160,5 mió. kr. settar av á hesum uppskoti sum stuðul til fiskivinnuna, harav 87 mió. kr. til inntøkutrygd hjá fiskimonnum.

Sambært avtalu frá 28. mei í ár hevur ríkisstjórnin bundið seg til at veita landskassanum neyðug lán tey komandi 5-6 árini til umfígging av uttanlandslánum og til hall á fíggjarlógini.

Tá vanligur rakstur er goldin, vísir uppskotið til fíggjarløgtingslóg eitt avlop upp á 11,6 mió. kr. Útreiðslur til viðlíkahald og fløgur hava tó við sær, at samlaða hallið verður mett til 247,9 mió. kr.

Í vár gjørdi landsstýrið avtalu við tey almennu fakfeløgini um lønarlækking. Sáttmálarnir ganga út á nýggjárinum, og samráðingar verða væntandi í heyst um nýggjar sáttmálar. Lønarútreiðslurnar í hesum uppskoti eru settar sambært teimum sáttmálum, sum eru galdandi í dag.

Uppskotið til fíggjarløgtingslóg er sett nakað øðrvísi upp enn fyrr. Allar størri viðlíkahalds-útreiðslur eru settar fyri seg, og eru tær tils. 91,5 mió. kr. Landsstýrið heldur tað vera alneyðugt, hóast trongar fíggjarumstøður, at halda samfelagsins ognir viðlíka. Játtanir eru settar av til viðlíkahald av vegum, havnum og øðrum, sum Landsverkfrøðingurin umsitur, skúlum, sjúkrahúsum og øðrum almennum bygningum.

So vítt gjørligt hevur dentur verið lagdur á at gera uppskot til fíggjarløgtingslóg, sum gagnar vinnulívivnum og kann gera sítt til, at fleiri fólk fáa arbeiði. Tí er meira sett av enn vant til viðlíkahald, tí hildið verður, at hetta gevur nogv arbeiði. Eisini játtanirnar til fløgur eru arbeiðsskapandi.

Fyri at lætta um hjá vinnulívinum er ætlanin at taka brennuoljuavgjaldið av hjá framleiðsluvirkjum, at játta pening til útflutning av vørum úr triðjalandsfiski, at seta pening av til nýggj vinnuvirki, og at hækka játtanina til tiltøk fyri ung.

Sum heild kann tí sigast, at hóast trongar fíggjarligar umstøður miðar hetta uppskotið ímóti at lætta um hjá vinnuni og at stuðla, so meira arbeiði verður í landinum.

Samanfatað eru inntøkur og útreiðslur á fíggjarlógaruppskotinum hesar:

Inntøkur.....	2.515.705 kr.
- Rakstrarútreiðslur.....	2,504.144 -
Avlop.....	11.561 -
- Viðlíkahaldsútreiðslur.	91.450 -
Hall.....	79.889 -
- Fløgur.....	168.060 -
Hall tilsamans.....	247.949 -

Rentur gerast ein alsamt tyngjandi byrða á útreiðslusíðuni. Útrokningarnar vísa, at næsta ár, skal landskassin rinda 386.6 mió. kr. í rentum. Í gjaldførisyvirlitinum sæst, at avdráttirnir verða 960 mió. kr. harav 315 mió. kr. til ríkiskassan, 489 mió. kr. av øðrum uttanlands-

lánum og 156 mió. kr. av lánum í Føroyum. Umfígging av skuld og hall á fíggjarløgtingslógini gera, at lánitørvurin til gjaldførið verður 1,2 mia. kr.

Fylgisskjøl eru viðløgd uppskotinum til fíggjarløgtingslóg, og her skulu tí bert gerast nakrar viðmerkingar:

Grein 1 - 1201: Vanligur landsskattur. Á fíggjarløgtingslógini 1993 varð mett, at skattainntøkan fór at verða 769 mió. kr. í mai 1993 varð fíggjarlógin endurskoðað, og tá varð mett, at skattainntøkan í 1993 fór at verða 646 mió. kr., men síðani hevur tað víst seg, at inntøkan hevur verið heldur størri enn mett. Hetta tykist hanga saman við, at fólk hava clearað konti í peningastovnunum. Skattagrundarlagið gerst tá størri, meðan rentuinntøkan -hóast hækkaðan rentuskatt - gerst minni.

Inntøkurnar av vanligum skatti í 1994 verða mettar til 745 mió. kr. Uppi í hesum tali eru 35 mió. kr., sum væntandi fáast við at broyta skattastigan. Broyting hevur við sær, at hægri inntøkur gjalda heldur meira skatt enn nú, men 50% markið í vanliga skattaútrokningini verður tó varðveitt.
10 mió. kr. verða ætlandi fingnar til vega við at toyggja frádráttin av privatum veðhaldsútleggum.

Landsstýrið fer at leggja uppskot um hesar broytingar fyri tingið í heyst.

Lógin um cykaskatt í 1993 verður longd til eisini at galda í 1994.

Grein 1 - 1215: Felagsskatturin verður mettur til 30 mió. kr., sum er 11 mió. kr. meira enn í 1993. Skattalógin varð broytt í 1992 soleiðis, at skattaprosentið hjá størri vinnufeløgum varð lækkað úr 49% niður í 22%. Landsstýrið umhugsar at leggja uppskot fyri tingið um at hækka henda felagaskattin til 35%.

Eitt endamál við skattalækkingini var at fáa útlendsk feløg skrásett í Føroyum, men onki útlendskt felag er skrásett, og haraftrat hevur danska Índnaðarmálaráðið boðað frá, at tað góðtekur ikki, at donsk vinnufeløg verða skrásett í Føroyum fyri at koma undir lagaligari skattaskipan enn í Danmark. Onnur norðurlond hava treytað eina møguliga avtalu av, at Danmark eisini góðtekur eina slíka skipan.

Ein avleiðing av tí lága felagsskattinum er, at tað loysir seg líka væl hjá feløgunum at hava pening innistandandi í útlendskum sum føroyskum peningastovnum, tí felagsskatturin og rentuskatturin eru sama prosent - 22%- og rentuinntøkurnar hjá feløgum verða skattaðar sum onnur inntøka.

Landsstýrið ætlar at leggja uppskot fyri tingið um at broyta skattalógina, so at rentuinntøkur hjá feløgum av innistandandi í føroyskum peningastovnum verða skattaðar við 22% eins og aðra rentur, sum standa í føroyskum peningastovnum. Útlendskar rentur verða haraftrímóti skattaðar sum onnur inntøka.

Grein 2 - 2022: Meirvirðisgjaldið varð mett at geva landskassanum 563 mió. kr. í 1993, men inntøkan fyrra hálvár bendir á, at inntøkan verður ikki meira enn 480 mió. kr. Sama tal er sett á uppskotið til fíggjarløgtingslóg 1994.

Grein 2 - 2041: Brennioljugjaldið er sett til 6. kr. í 1994 ella 9 mió. kr. lægri enn í 1993. Landsstýrið fer at leggja uppskot fyri tingto um at sleppa fiskavirkjum, iðnaðarvirkjum og gistingarhúsum undan oljugjaldi.

Grein 2 - 2713/23615: Virðis- og vektargjald er sett til 10 mió. kr. ella 25 mió. kr. minni enn í 1993. Innflutningurin av akførum er minkaður niður í lítið og einki. Umskrásetingargjaldið er somuleiðis lækkað 1 mió. kr. til 2 mió. kr.

Grein 12 - 12012: Hjálpitólamiðstøðin verður niðurløgd sum serstakur stovnur, og umsitingin av hjálpitólum verður løgd undir Almannastovuna.

Grein 18: Landskassin hevur latið studning, tá frystur og feskur fiskur er keyptur uttanlands ella frá fremmandum skipum. Uppskot verður lagt fyri tingið um at taka hesa skipan av.

Í staðin er ætlanin at lata studning sum javning móti tollverju. Fiskavørur, framleiddar úr triðjalandsfiski, verða tollaðar við upp í 18%, tá tær verða innfluttar til EF-lond.

EF-lond, sum keypa triðjalandsfisk, rinda toll, tá fiskurin verður keyptur. Umrokuað til toll á lidnari vørur svarar hann til 9%.

Ætlanin er at lata part av tollmuninum sum studning, so at føroysk virki gerast kappingarfør á EF-marknaðinum.

Grein 18 - 18703 Tiltøk fyri ung: 5 mió. kr. standa á fíggjarlógini 1993 til tiltøk fyri ung. Kommunurnar hava sýnt stóran áhuga at seta smærri arbeiði í gongd, sum kunnu fáa nøkur ungfólk í arbeiði í eina tíð, og landsstýrið skjýur tí upp at tvífalda játttanina til 10 mió. kr.

Grein 18 - Vinnufremjandi virksemi: Ein ávísur áhugi er fyri at fara undir nýggjar vinnufyritøkur, men tað gongst striltið at fáa fígging.

Skotið verður tí upp at seta 30 mió. kr. av til hetta endamál. Landsstýrið fer at leggja uppskot fyri tingið um eina skipan. Væntandi verður skipanin tann, at um peningastovnur metir, at ein verkætlan hevur møgulcikar at bera seg, veitir landskassin veðhald fyri parti av láninum, javntsett láni úr peningastovni.

Upphæddin á fíggjarløgtingslógini verður tøk at standa ímóti við, um veðhaldini gerast effektiv.

Grein 21 - 21019 Effektivar veðhaldsbindingar: Tey veðhald, sum landskassin noyðist at leggja út fyri fiskavirki, falla væntandi øll til gjaldingar í 1993. Tey vinnuveðhald, sum tá eru eftir, eru flestøll fyri skip. Roknað verður við, at 55 mió. kr. røkka til tey effektivu veðhaldini í 1994.

Við hesum viðmerkingum og fylgiskjølunum verður uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri 1994 lagt fyri løgtingið. Henda óvæntaðar broytingar í samfelagnum út á heystið, fer landsstýrið at senda fíggjarnevndini skriv við uppskotum um møguligar broytingar.

1. viðgerð 14. september 1993. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 18. desember 1993

legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 31. august 1993 og eftir 1. viðgerð 14. september 1993 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini eru tær einstøku greinarnar og tey einstøku rakstrarstøðini á fíggjarlógaruppskotinum umrødd. Eisini er støðan í samfelagnum sum heild umrødd og gjølliga viðgjørd.

Millum annað hevur nevndin umrøtt og viðgjørt støðuna hjá landbúnaðinum. Hetta er gjørt á fundi við Føroya Bóndafelag, Føroya Jarðarráð og Mjólkarvirki Búnaðarmanna. Á fundinum við umboðini fyri landbúnaðin vórðu mjólkarframleiðslan og stuðulin til kjøtframleiðsluna serliga umrødd.

Støðan á arbeiðsmarknaðinum er viðgjørd á fundi við Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag, Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Handverkarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag. Á hesum fundum varð serligur dentur lagdur á at útvega fleiri arbeiðspláss og at bøta um støðuna hjá teimum arbeiðsleysu.

Á fundi við Føroya Sparikassa og Suðuroyar Sparikassa, Føroya Banka og Sjóvinnubankan er støðan á peningamarknaðinum viðgjørd. Á hesum fundum varð støðan hjá scthúsaeigarunum og fíggingartørvurin hjá vinnulívinum serliga umrødd. Á fundinum við bankarnar varð serligur dentur lagdur á at fáa lýst støðuna og framtíðarvánirnar hjá bankunum.

Støðan hjá alivinnuni og støðan hjá fiskivinnuni á sjógvi og landi, herundir marknaðarútlitini, eru viðgjørd á fundi við Føroya Havbúnaðarfelag, Føroya Fiskasølu, Føroya Fiskavirking, Føroya Reiðarafelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag og marknaðarráðgevan Óla Samró. Hóast vánaligu støðuna hjá vinnuni fyrr í ár høvdu umboðini fyri vinnuna ávísar vónir um framtíðina.

Umframt frammanfyri nevndu, sum fíggjarnevndin hevur boðið á fund, hevur nevndin eftir umbøn eisini hildið fund við umboð fyri Føroya Ungdómsráð, umboð fyri Ítróttarsambandið Føroyar, Blákrossheimið, Heilbrigdið, Arbeiðseftirlitið, Føroya Maskinskúla og umboð fyri starvsfólkini á Hjálpitólamiðstøðini.

At enda hevur nevndin hildið fund við Búskaparráðið, Maritu Petersen, løgmann, Finnboga Ísakson, landsstýrismann í fíggjarmálum, og landsstýrismenninar Thomas Arabo, Signar á Brúnni, Jóannes Eidesgaard og Bergur Jacobsen.

Á fundinum við Búskaparráðið varð fíggjar- og búskaparstøðan sum heild umrødd. Frá Búskaparáðnum fekk nevndin tær seinastu inntøkumetingarnar fyri 1994. Ávegisálitið frá føroysku serfrøðingarnevndini fekk eisini cina drúgva umrøðu á fundinum.

Á fundunum við løgmann og landsstýrismenninar vórðu málsøkini hjá avvarðandi landsstýrismonnum umrødd. Landsstýrisfólkini greiddu frá teimum greinum og einstøkum rakstrarstøðum, sum hava við teirra málsøkir at gera, eins og tey svaraðu spurningum frá fíggjarnevndarlimunum.

Á fundinum við Finnboga Ísakson, landsstýrismann í fíggjarmálum, fekk fíggjarnevndin eitt tilmæli um sparingar frá landsstýrinum. Landsstýrismaðurin greiddi frá, at landsstýrið í hesum mælir til, at útreiðslusíðan verður skorin við 109.663.000 kr., og at nøkur útreiðslutøl verða hækkað við tilsamans 9.435.000 kr. Talan er sostatt um eina nettosparing upp á 100.228.000 kr.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Johannes Ellefsen, Hergeir Nielsen og Karl Heri Joensen) vísir á, at meðan fíggjarlógaruppskotið, sum varð framlagt 31. august sýndi eitt samlað halli uppá stívliga 248 milliónir krónur, so kom umsitingin seinni fram til, at um eingi tiltøk vórðu settt í verk, verður hallið 540 milliónir krónur.

Á inntøkusíðuni varð vanligur landsskatur mettur 67 milliónir krónur ov høgt, felagsskatturin varð mettur 11 milliónir krónur ov høgt, rentuskatturin 14 milliónir krónur, meirvirðisgjaldið 40 milliónir og punktgjøldini vórðu mett 10 milliónir krónur ov høgt. Samanlagt gevur hetta eina minniinntøku upp á 142 milliónir krónur.

Fíggjarognaravgjaldið og lønarhæddargjaldið, sum eru ásett við nýggjum inntøkulógum, verða mett at geva landskassanum eina cykainntøku upp á 213 milliónir krónur. Meirilutin mælir til, at inntøkusíðan á fíggjarlógini verður broytt út frá hesum og setir fram broytingaruppskot samsvarandi.

Meirilutin í fíggjarnevnd løgtingsins mælir til, at játtaðar verða kr. 300.000 til setan av fulltrúa við hægri útbúgving á løgtingsskrivstovuni og kr. 300.000 til nýggja konto 10177 Løgtingsins umboðsmaður sambært løgtingssamtykt.

Somuleiðis mælir meirilutin til, at játtanin til Klaksvíkar sjúkrahús verður bert skerd við kr. 500.000 í mun til uppskot landsstýrisins, har játtanin verður skerd v. 3 1,5 mió. kr., soleiðis at játtanin verður upp á kr. 38.364.000.

Í § 13 mælir meirilutin til at geva strandferðsluni eina meirjáttan upp á kr. 1 mió. í mun til tilmæli landsstýrisins dagf. 9. desember 1993, har stovnurin varð lækkaður við kr. 2 mió., t.v.s. at játtanin fyri 1994 verður upp á kr. 37 mió. Meirjáttanin er treytað av einum nøktandi túratali, og hevur meirilutin í huganum serstakliga tað vánaligа sambandið millum Suðuroynna og meginøkið.

Í § 14 fær rakstrarstað 14656 Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð eina játtan upp á 2.596.000 kr. Skúlabókagerð fær 244.000 kr. Rakstrarastað 14808 Skúlabókaútgáva 3.669.000 kr., stuðul til rakstur av Bókamiðsølu 400.000 kr. og rakstrarstað 15907, Barnablað 100.000 kr. og 15907 Barnabókaútgáva 970.000 kr. Samanlagt er talan um 7,8 mió. kr. + húsaleigu 970.000 kr.

Meirilutin heldur, at hetta virkar skilaleyst, og at ein samanlegging við tí fyri eyga at spara munandi pening eigur at fara fram. Tað er eisini ein spurningur, um ein partur av hesum virksemi ikki kann samskipast við virksemi hjá Landsbókasavninum, fólkabókasøvnum, skúlunum, forløgum og bókhandlum. Meirilutin mælir til, at landsstýrið sum allarskjótast tekur hetta spurning til álvarsliga viðgerð.

Í § 15 verður, vísandi til ta truplu støðuna hjá ungdóminum í sambandi við arbeiðsloysið, játtanin til ungmannafeløg og skótarørsluna hækkað við 100.000 kr. til 600.000 kr. soleiðis, at støðið verður tað sama sum í verandi fíggjarári.

Í § 18 verður Arbeiðseftirlitið sett til kr. 2,6 mió. Hetta kemst av einum feili í uppskoti landsstýrisins frá 9. desember 1993.

Í § 19 verður umsiting av hjálpitólum økt við kr. 700.000 til kr. 1,7 mió. orsakað av, at feilur er í uppskoti landsstýrisins frá 9. desember 1993 til fíggjarnevndina.

Frammanfyristandandi broytingar eru upp á tilsamans kr. 3.800.000. § 21 Effektivar veðhaldsbindingar verða lækkaðar við kr. 5 mió. til kr. 90 mió. Vísandi til, at so stórur partur av fiskivinnuni og fiskaídnaðinum longu hava verið fgjøgnum stórar saneringar, heldur meirilutin, at landsstýrið hevur mett tørvin fyri pening til effektivar veðhaldsbindingar í meira lagi, og verður tí játtanin lækkað.

Vísandi til upplýsingarnar og viðmerkingarnar frammanfyri setir meirilutin (Vilhelm Johannesen, Jóhannes Ellefsen, Hergeir Nielsen og Karl Heri Joensen) fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

§ 1	Innøkuskattir	
	1201 Vanligur landsskattur verður lækkað við kr. 67.000.000 og sett til	kr. 678.000.000
	1215 Felagsskattur verður lækkaður við kr. 11.000.000 og sett til	kr. 19.000.000
	1702 Rentuskattur verður lækkaður við kr. 14.000.000 og sett til	kr. 66.000.000
	Greinin verður sett til	kr. 763.000.000
§ 2.	Toll-,nýtslu- og framleiðslugjøld	

2022 Meirvirðisgjald verður lækkað við kr. 40.000 og sett til	kr. 440.000.000
2017 Punktgjøld verður lækkað við kr. 10.000.000 og sett til	kr. 160.000.000
Fíggjarognaravgjald	kr. 200.000.000
Lønarhæddaravgjald	kr. 13.000.000
Greinin verður sett til	kr. 918.000.000

§ 10. Løgtingið

10158 Løgtingsskrivstovan verður økt við kr. 300.000 og sett til	kr. 2.343.000
10177 Løgtingsins umboðsmaður	kr. 300.000
Greinin verður sett til	kr. 15.929.000

§ 11. 11359 Almannastovan verður lækkað við kr. 700.000 og sett til — kr. 17.000.000

11433 MVG-skipanin verður lækkað við kr. 500.000 og sett til — kr. 500.000

11758 Ferða- og dagpeningur verður lækkaður við kr. 400.000 og sett til — kr. 3.200.000

11991 Aðrar útreiðslur:

203507 Umboðan verður lækkað við kr. 300.000 og sett til — kr. 800.000

253704 Útreiðslur av vali verður lækkað við kr. 100.000 og sett til — kr. 800.000

Greinin verður sett til — kr. 136.974.000

§ 12 12026 Útr. viðv. Ríkissjúkrahúsinum
Verður lækkað við kr. 500.000
og sett til — kr. 26.000.000
12109 Landssjúkrahúsið
verður økt við kr. 500.000
og sett til — kr.207.898.000
12202 Klaksvíkar sjúkrahús
verður lækkað við kr. 500.000
og sett til — kr 38.364.000
12907 Ymiskar útreiðslur:
3031143 Uppl/viðg.móti rúsdrekka
verður lækkað við kr. 1.500.000
og sett til — kr. 9.500.000
Viðlíkahald:
Landssjúkrahúsið verður
lækkað við kr. 5.000.000
og sett til — kr. 10.000.000
Klaksvíkar Sjúkrahús verður
lækkað við kr. 500.000
og sett til — kr. 1.000.000

Íløgur:
12983 Suðuroyar Sjúkrahús, nýb./umb.
verður lækkað við kr. 3.000.000
og sett til — kr. 18.000.000

Greinin verður sett til — kr. 328.410.000

§ 13 13265 Strandferðsla Landsins verður
lækkað við kr. 1.000.000
og sett til — kr. 37.000.000
13089 Postverkið verður
lækkað við kr. 2.000.000
og sett til — kr. 3.000.000
Viðlíkahald:
13094 Rakstur av vegancti verður
lækkað við kr. 500.000
og sett til — kr. 20.000.000
13056 Fyritøkur og útgerð hjá LV
verður lækkað við kr. 3.500.000
og sett til — kr. 25.000.000
Íløgur:
13018 Nýggir vegir og brýr verður
lækkað við kr. 3.400.000
og sett til — kr. 16.800.000

	13061 Berghols- og brúgvagerð verður lækkað við kr. 6.000.000 og sett til	kr. 8.000.000
	13023 Havnagerð verður lækkað við kr. 8.000.000 og sett til	kr. 20.000.000
	13037 Lendingar verður lækkað við kr. 3.000.000 og sett til	kr. 9.000.000
	13989 Útvarpssendistøð verður økt við kr. 2.500.000 og sett til	kr. 5.500.000
	Greinin verður sett til	kr. 48.250.000
§ 14	14103 Fólkaskúlin verður lækkað við kr. 1.900.000 og sett til	kr. 130.663.000
	14122 Sernámsfrøðilig ráðgeving verður lækkað við kr. 100.000 og sett til	kr. 25.777.000
	14155 Føroyskir skúlar uttanlands verður lækkað við kr. 50.000 og sett til	kr. 260.000
	14257 Fiskivinnuskúlin í Vestmanna verður lækkað við kr. 42.000 og sett til	kr. 2.427.000
	14326 Klaksvíkar Sjómansskúli verður økt við kr. 300.000 og sett til	kr. 2.349.000
	14331 Klaksvíkar HF-skeið verður lækkað við kr. 416.000 og sett til	kr. 2.000.000
	14364 Eysturoyar Studentaskúli og HF-skeið verður lækkað kr. 273.000 og sett til	kr. 10.282.000
	14378 Føroya Studentaskúli og HF-skeið verður lækkað við kr. 369.000 og sett til	kr. 20.260.000
	14409 Føroya Handilsskúli verður lækkað við kr. 304.000 og sett til	kr. 14.900.000
	14414 Tekniski Skúli í Tórshavn verður lækkað við kr. 650.000 og sett til	kr. 11.020.000

14452 Føroya Læraraskúli verður lækkað við kr. 443.000		
og sett til	kr.	9.759.000
14466 Føroya Sjómansskúli verður lækkað við kr. 321.000		
og sett til	kr.	7.149.000
14471 Føroya Maskinskúli verður lækkað við kr. 255.000		
og sett til	kr.	6.000.000
14485 Dieselsimolator verður lækkað við kr. 50.000		
og sett til	kr.	500.000
14554 Fróðskaparsetrið verður lækkað við kr. 318.000		
og sett til	kr.	10.300.000
146661 Húsarhaldsskúlar verður økt við kr. 108.000		
og sett til	kr.	1.100.000
14739 Ymist verður lækkað við kr. 20.000		
og sett til	kr.	440.000
14744 Eftirútbúgving verður lækkað við kr. 164.000		
og sett til	kr.	400.000
14832 Skúlabókagerð verður lækkað við kr. 100.000		
og sett til	kr.	244.000
14851 Rakstur av Bókamiðsølu verður lækkað við kr. 100.000		
og sett til	kr.	400.000
14901 Útbúgvingarstuðul verður lækkað við kr. 2.000.000		
og sett til	kr.	44.500.000
14915 Eftir útbúgving av sjómonnum verður lækkað við kr. 100.000		
og sett til	kr.	0
Viðlíkahald:		
Fróðskaparsetur Føroya verður lækkað við kr. 500.000		
og sett til	kr.	7.149.000
Studentaskúlin í Hoydølum verður lækkað við kr. 800.000		
og sett til	kr.	20.260.000
Tekniski skúlin í Havn verður lækkað við kr. 1.250.000		
og sett til	kr.	11.020.000
Íløgur:		
Fólkaskúlin, nýb. verður		

	lækkað við kr. 1.500.000	
	og sett til	kr. 500.000
	Bókamiðsølan, innrætting verður	
	lækkað við kr. 1.100.000	
	og sett til	kr. 400.000
	Maskinskúli verður lækkað	
	við kr. 5.000.000	
	og sett til	kr. 0
	Greinin verður sett til	kr. 354.708.000
§ 15	15615 Sjónvarp Føroya verður	
	lækkað við kr. 1.000.000	
	og sett til	kr. 1.000.000
	15629 Mentannargrunnur verður	
	lækkað við kr. 500.000	
	og sett til	kr. 1.300.000
	15634 Føroyahús í Keypmannahavn verður	
	lækkað við kr. 80.000	
	og sett til	kr. 900.000
	15703 Náttúrugripasavnið verður	
	økt við kr. 280.000	
	og sett til	kr. 3.471.000
	Íløgur:	
	15907 323198 Ungmannafeløg og skóta-rørsla verður økt við kr. 100.000	
	og sett til	kr. 600.000
	15983 323492 Sjónvarpið, nýb./umb.	
	verður lækkað við kr. 2.250.000	
	og sett til	kr. 1.750.000
	323181 Stuðul til bygdahús, nýb. verður	
	lækkað við kr. 500.000	
	og sett til	kr. 900.000
	323738 Studn. til ítróttabygging verður	
	lækkað við kr. 1.560.000	
	og sett til	kr. 800.000
	323937 Graslíkisvøllir verður	
	lækkað við kr. 300.000	
	og sett til	kr. 300.000
	Greinin verður sett til	kr. 40.893.000
§ 16	Íløgustuðul verður lækkað	
	við kr. 5.000.000	
	og sett til	kr. 45.000.000

	16469 Varðveiting av fjølbroyttum flota verður lækkað við kr. 3.000.000 og sett til	kr.	5.600.000
	16488 Praktiskar fiskiroyndir verður lækkað við kr. 2.000.000 og sett til	kr.	8.000.000
	Fløgur:		
	16994 Lívfiskastøð verður lækkað við kr. 2.000.000 og sett til	kr.	10.000.000
	Greinin verður sett til	kr.	112.970.00
§ 17	17898 Studningur til landbúnaðin verður lækkað við kr. 500.000 og sett til	kr.	16.500.000
	17219 Avloysarar fyri mjólarframl. verður lækkað við kr. 100.000 og sett til	kr.	480.000
	17307 Skógrøkt Landsins verður lækkað við kr. 108.000 og sett til	kr.	1.200.000
	Greinin verður sett til	kr.	25.180.000
§ 18	18109 Arbeiðseftirlit verður økt við kr. 100.000 og sett til	kr.	2.600.000
	18166 Brunaumsjón Landsins verður lækkað við kr. 500.000 og sett til	kr.	0
	18235 Ráðið fyri Ferðslutrygd verður lækkað við kr. 176.000 og sett til	kr.	700.000
	18361 Menningarstovan verður lækkað við kr. 300.000 og sett til	kr.	2.200.000
	18532 Stuðul til ídn. framjandi endamál verður lækkað við kr. 500.000 og sett til	kr.	1.500.000
	Skipabyggiendurgjald verður lækkað við kr. 3.000.000 og sett	kr.	5.000.000
	18598 Sáttmálaeftirlit verður lækkað við kr. 200.000 og sett til	kr.	0

	18601 Heilsufrøðilig Starvsstova verður lækkað við kr. 298.000 og sett til	kr. 4.900.000
	18653 Orkuráðið verður lækkað við kr. 700.000 og sett til	kr. 0
	Vinnufremjandi virksemi verður lækkað við kr. 5.000.000 og sett til	kr. 25.000.000
	Greinin verður sett til	kr. 57.107.000
§ 19	19059 Fólkapensjón verður lækkað við kr. 7.200.000 og sett til	kr. 240.900.000
	19075 Røktarheim verður økt við kr. 4.300.000 og sett til	kr. 69.500.000
	19089 Vistarheim fyri pensjónistar verður økt við kr. 700.000 og sett til	kr. 5.700.000
	19106 Avlamispensjón verður lækkað við kr. 2.100.000 og sett til	kr. 110.400.000
	Umsiting av hjálpitólum verður økt við kr. 700.000 og sett til	kr. 1.700.000
	19607 Heilsu- og Heimarøktarskipanin verður økt við kr. 1.000.000 og sett til	kr. 60.070.000
	19892 Vanlukkutryggingarráðið verður lækkað við kr. 400.000 og sett til	kr. 100.000
	19904 Ymsir studningar: 363557 Hús hjá Deyvafelagnum verður lækkað við kr. 70.000 og sett til	kr. 630.000
	363565 Blindaheimið verður lækkað við kr. 536.000 og sett til	kr. 3. 464.000
	363648 ALV verður lækkað við kr. 50.000 og sett til	kr. 300.000
	363669 Feløg teirra brekaðu verður lækkað við kr. 80.000 og sett til	kr. 800.000
	3663797 Ráðg. f. føroyingar í DK	

verður økt við kr. 47.000		
og sett til	kr.	507.000
363835 Trygdargrunnur		
verður lækkað við kr. 80.000		
og sett til	kr.	470.000
373305 Landsstýrinum at ráða yvir		
verður lækkað við kr. 50.000		
og sett til	kr.	200.000
1994 Bústovnar, serforsorg		
verður lækkað við kr. 3.000.000		
og sett til	kr.	0
1994 Uml. heim. og bústovnur, Suðuroy		
verður lækkað við kr. 500.000		
og sett til	kr.	1.500.000
19904 Røktarhe. og eldrasamb. Norðstr.		
verður lækkað við kr. 500.000		
og sett til	kr.	500.000
Greinin verður sett til	kr.	860.233.000
§ 21 Effektivar veðhaldsbindingar		
21019 Effektiv veðhald fyri privatar fyritøkur		
verður lækkað við kr. 5.000.000		
og sett til	kr.	50.000.000

Út frá hesum verða samlaðu inntøkurnar kr. 2.586.705, og samlaðu útreiðslurnar verða kr. 2.848.294, og hallið verður lækkað til kr. 261.589.000.

Vísandi til upplýsingarnar og viðmerkingarnar frammanfyri setir meirilutin (Vilhelm Johannesen, Jóhannes Ellefsen, Hergeir Nielsen og Karl Heri Joensen) fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Sí skjal 3

Ein minniluti (Anfinn Kallsberg) hevur hesar viðmerkingar:

Í áttatiárunum høvdu vit búskaparligan vøkstur í Føroyum. Seinrapartin av hesum tíðarskeiði var hann so stórur, at hann vaks okkum yvir høvdið. Vøksturin grundaði seg ikki á framleiðslu og eksport, men tíverri alt ov nógv á lántøku, eina lántøku, sum vit tíverri ikki

rættiliga høvdu yvirlit yvir, fyrrenn ov seint var.

Taka vit til dømis árið 1988, so fingu vit tað árlið tilført stóran kapital uttanífrá, heilar 5 mia. krónur. Hesar 5 mia. sundurgreinast í høvuðsheitum soleiðis:

Eksportur	2.500 mió.
Ríkisstuðul	900 mió.
Lántøka	1.500 mió.
	4.900 mió.

Samlaða nettolántøka samfelagsins var komin upp á 8 mia. krónur við ársenda 1988. Tí var neyðugt at broyta búskaparvanarnar. Lánsskuld samfelagsins mátti ikki økjast, og samstundis var greitt, at lánveitararnir vóru ikki longur ídnir fyri at koma við lántilboðum.

Peningarúkiligheitin førdi við sær nógv arbeiði, stóran íløguhug og stóra nýtslu. Lønarhækkingar fylgdu við, og almenna nýtslan øktist eisini nógv. Lønarhækkingar og stór nýtsla høvdu eisini við sær størri inntøkur til landskassan (og kommunurnar) frá skattum og avgjøldum.

Politiskt var tí í 1989 neyðugt at gera tiltøk, sum bøttu um handils- og gjaldsjavnan soleiðis, at vøksturin í uttanlandsskuldini steðgaði. Hetta eydnaðist eisini, skuldarvøksturin minkaði longu í 1989, og í 1991 høvdu vit fyri fyrstu ferð beinleiðis yvirskot á gjaldsjavnanum. Tað vil siga, at uttanlandsskuldin minkaði.

Samstundis øktist tó hallið á fíggjarlógini, sjálvt um nógv varð spart. Takið var tí nú at fáa javnvág aftur á fíggjarlógina. Frá 1989 og serliga í 1990 og 1991 høvdu vit eisini viðrák á útflutningsmarknaðinum. Yvirhøvur vóru útflutningsprísirnir góðir, og tí høvdu vit møguleika at bøta um fíggjarstøðuna, sjálvt við teim ógvusligu eykaútreiðslunum, vit fingu av falnu veðhaldsskyldum landskassans.

Í 1992 vendi alt. Fiskiskapurin versnaði nógv, samstundis sum fiskiprísirnir fullu, og stuðulin til fiskivinnuna var nærum spardur burtur á fíggjarlógini.

Eisini annað virksemi var minkandi og minkaði uppaftur meir av somu orsøk.

Tað mest ógvusliga, sum so hendi, var, at Fíggareftirlitið kravdi stórar avsetingar í bankunum, so stórar, at bankarnir skuldu hava stórar kapitalinnsprøningar.

Bankarnir eru týdningarmikil depil í peningarenslinum, og hjálpin til bankarnar og umrøðan av hesum og krøvini frá donsku stjórnini gjørdu, at hesin depil fyri stóran part typti peningarenslið. Hetta fekk tær mest álvarsomu fylgjur fyri føroyska búskapin gangandi, kom í staðin at steðga allari búskaparligari gongd. Fyri hvørja ferð meiri kapitalur er flutur bankunum, er støðan fyri heildarbúskapin versnað.

Samstundis og sum avleiðing av kapitalflutninginum til bankarnar fingu vit eisini monopoliseringina av fiskaframleiðsluni. Hetta hevur eisini forðað búskaparligu gongdini, heldur enn at fremja hana.

Arbeiðsloysið, sum byrjaði at taka seg upp, tá ið lántøkan steðgaði, hevur bert vundið upp á seg. Serliga aftan á bankakreppurnar hevur arbeiðsloysið bitið seg fast, samstundis sum hvørki vilji ella evni ella semja til at royna at loysa trupulleikarnar hava vist seg at verið til staðar.

Uppskot samgongunnar til fíggjarlóg fyri 1994 er eitt framhald av at økja um skattatrýstið, at hækka kostnaðarstøðið, enn fleiri arbeiðsleys, sum harvið einki annað vita sær enn at rýma av landinum.

Tað verður neyðugt at leggja á annan bógv við at lækka skattatrýstið, lækka kostnaðarstøðið, og harvið fáa hjólini aftur at mala, og harvið fleiri aftur í arbeiði. Við hesum útgangsstøði mælir fólkaflokkurin til, at vit fáa eina nýggja fíggjarlóg, og tekur tí ikki undir við uppskotinum frá meirilutanum.

Hvat er at gera ?

Uppskot hava verið frammi um fyrst og fremst at fáa føroyska kostnaðarstøðið lækkað. Men ongatíð hevur semja ella meiriluti fingist fyri hesum.

Spurningurin er, um tað nú er ov seint at gera nakað. Tað er seint, men ongatíð má ein gevast á hondum. Tí eigur aftur at verða roynt at láa allar góðar kreftir sameindar til at taka tey tøk, sum neyðug eru.

Heildarætlan má tí gerast, og hon má setast í verk beinanvegin soleiðis, at hon virkar sum skjótast og fær gongd á aftur búskapin.

Ætlanin kann býtast í nakrar høvuðspartar:

1. Lánviðurskiftini millum landskassan og ríkiskassan.
2. Lánviðurskiftini hjá kommunum.
3. Kostnaðarstøðið, herundir
   a. Skatta- og avgjaldsstøðið
   b. Lønarstøðið
4. Fíggjarlógarviðurskiftini.
5. Vinnulívsbroytingar.
6. Sethúsalánsviðurskifti.

1. Lánviðurskifti millum landskassan og ríkiskassan.

Uttanlandsskuldin hjá føroyska samfelagnum er ikki økt síðani 1990. Men landskassans skuld er í samband við fíggingina til bankarnar økt nógv, samstundis sum privata uttanlandsskuldin er nógv minkað. Landskassans skuld til statskassan fer at nærkast 6 mia. kr. um eini tvey ár.

Tað er ógvuliga ivasamt, um Føroya heimastýri hevur heimild at læna pening í útlondum, tá tað er danski forsætisráðharrin, sum hevur eftirlitið í hondum, fyrst og fremst í fíggjarspurningum við útlond (samb. § 6).

Tað er tí ivasamt, um tær avtalur, ið gjørdar eru við ríkismyndugleikararnar um lán til landskassan og avtalur um endurfígging av uttanlandslánum okkara skulu skiljast sum lán ella skulu bókast yvir millumrokning.

Tað hevur tí allar størsta týdning, at avklára og fáa bindandi langtíðaravtalu millum landsstýrið og donsku stjórnina um renting og afturrindan av hesum millumverandi. Føroyski búskapurin klárar ikki - fyrstu tíðina ið hvussu er - tær stóru afturgjaldingarnar. Men fyri at fáa eina lagaliga avtalu krevst, at tey seinru nevndu punktini fáa eina skilagóða loysn, soleiðis at vit hava nakað haldgott at vísa á. Um so verður, ivist eg ikki í, at ein avtala fæst í lag, ein avtala, sum samstundis loysir okkum frá tí núverandi hafti, sum danska stjórnin hevur okkum í.

Út frá omanfyristandandi verður sett fram soljóðandi

I

U p p s k o t

til
samtyktar

Føroya Løgting samtykkir at áleggja Føroya Landsstýri at taka upp samráðingar við donsku stjórnina um at gera eina langtíðarætlan fyri rentu og afturgjalding av millumverandi okkara við Danska statskassan.

2. Lánviðurskiftini hjá kommunum.

Sjálvt um lóg um kreppulánsgrunn fyri kommunur er samtykt, er fíggjarliga støðan hjá kommunum als ikki loyst. Her er nógv eftir at gera, fyrst og fremst avtalur við lánveitararnar, nýggj kommunustrukturskipan og býtið millum land og kommunur o.s.fr. Hetta má fáast í lag soleiðis, at kommunur ikki framyvir koma at hava eitt skattaprosent, sum er hægri enn 18, santanber seinri.

Út frá hesum verður sett fram soljóðandi

II

U p p s k o t

til
samtyktar

Álagt verður Føroya landsstýri beinanvegin at taka upp samráðingar við kommunur við tí endamáli at fáa nýggja kommunuskipan, sum inniber, at avgerð og ábyrgd fylgjast, at eln loysn verður funnin á lántrupulleikunum, og at funnin verður ein skipan, har kommunuskattaprosentið ongantíð kann fara upp um 18%.

3. Kostnaðarstøðið.

Kostnaðarstøðið í samfelagnum er fyrst og fremst grundað á lønarstøðið, tá ið tað snýr seg um framleiðslu av einum og hvørjum slagi. Snýr tað seg um innfluttar vørur, er prísurin uttanífrá sjálvandi avgerandi. Ein annar partur av kostnaðarstøðinum er skattatrýstið,

Samanspælið millum lønir og skatt og avgjøld er eyðsýnt.

3a. Lønarstøðið.

Í nøkur ár hava vit í orðaskiftinum viðgjørt nógv, hvussu vit skulu fáa lønarstøðið niður uttan at lækka realløniná. Kanningar hava verið gjørdar, og tað skilagóða í hesum hevur verið rættiliga týðiligt, men ongantíð er eydnast at fáa semju um hetta, hvørki politiskt ella við fakfeløgini. Úrslitið hevur tí verið vaksandi arbeiðsloysi, vaksandi skattatrýst, partvísar tilvildarligar lønarlækkingar og harvið lækkandi realløn.

Hevði ein í staðin fyri lækkað allar lønir við ávísum prosentsatsi (skattalækkingarnar komi eg aftur til undir 3b), hevði alt (uttan lángjøld) verið bíligari. Tað vil siga, at

1) fíggjarlógin minkaði,
2) fíggjarætlanirnar hjá kommununum minkaðu,
3) vinnulívsvirki fingu betri rakstrarúrslit,
4) batnandi kappingarføri ger, at skipini standa seg betur og tora at royna aðrar fiskimøguleikar.
5) flakavirkini fáa meira fisk frá føroysku skipunum og fáa rakstrarligar møguleikar at keypa fremmandan fisk og viðgera hann meira við positivum dekningsavlopi,
6) onnur vinna, handverk, handil og hjálpivinnur av ymiskum slagi fáa aftur meira at gera,
7) av somu orsøk koma nógv fleiri aftur í arbeiði,
8) fleiri í arbeiði við somu realløn hevði økt um møguleikarnar hjá øllum handilslívinum,
9) av tí, at arbeiðsloysið hevði minkað, kundi gjaldið til arbeiðsloysistryggingina minkað,
10) sjálvt við lægri lønum komu landskassin og kommunurnar aftur at fáa vaksandi skattainntøkur við lægri skattaprosentum.

Vísandi til punkt 3a lønarstøðið, punkt 5 vinnulívsbroytingar og punkt 6 sethúsalánsviðurskifti verður sett fram soljóðandi

III

U p p s k o t

til
samtyktar

Álagt verður Føroya landsstýri við lóg at seta niður allar lønir í Føroyum, eisini tær donsku og danskt avtalaðu við 35%, og at skipaður verður ein serligur grunnur, sum skal hjálpa til við at sanera núverandi sethúsaskuld, vísandi til punkt 6.

Uppskotið er tí: Allar lønir í føroyska samfelagnum - eisini tær donsku og danskt avtalaðu - verða lækkaðar við 35%.

3b. Skatta- og avgjaldsstøðið.

Fyri at kunna lækka lønarstøðið, má skattastøðið eisini lækkast. Við núverandi árligu lønargjaldingunum upp á ca. 3,8 mia. kr. hevur ein 35% lækking við sær, at lønargjaldingar fyri eitt ár bert verða umleið 2,5 mia. kr. Men við teirri positivu ávirkan, lønarniðurskurðurin fær upp á lønarútgjaldingarnar einar 3,0 mia. kr. og annað árið einar 3,5 mia. aftur. Økingin er væl at merkja ikki nominellar lønarhækkingar, men økt virksemi.

Við eini lønarútgjaldsupphædd upp á ca. 3,0 mia. og saman við B-inntøkum (sum økjast av positivari gongd) og pensjónum v.m. verður samlaða skattskylduga inntøkan umleið 3,4 mia. kr.

Lækka vit landsskattaprosentið heilt nógv, kunnu vit fáa skattainntøkur til landskassan og kommunurnar nøkulunda av hesi stødd.

Kommunuskattur.

Skattskyldug inntøka		3.400 mió.
Fólkapensjónistar (sí seinri)	- 300	
Botnfrádráttur 15.000	- 400	700 mió.
		2.700 mió.
Skattur herav 18% (max)		486 mió.
Meirrindan fyri fólkapensjó.	30	
Rentufr. 13% av 400	- 52	
Barnafrádrátt	- 15	- 37 mió.
Skattainntøka kommununna		449 mió.

Samlaðu kommunalu fíggjarætlanirnar fyri 1994 eru leið 550 mió. kr. Við lækkandi útreiðslum vegna lønarniðurskurð skuldu uml. 450 mió. kr. verið hóskandi inntøka hjá kommunum undir núverandi skipan saman við betri lántreytum frá kreditorunum.

Landsskattur.

Skattskyldug inntøka		3.400 mió.
Fólkapensjónistar o.a.	- 300	
Botnfrádráttir 30.000	- 790	
		2.310 mió.
Skattur herav (meðal) 13%		310 mió.
Rentufrádr. 12% av 400	- 48	
Endurr.kom.fólkap.	- 30	
Barnafrádrátt	- 22	100 mió.
Skattainntøka landskassans		210 mió.

Her er roknað við, at farið verður yvir aftur til at gera grunduppæddina hjá fólkapensjónistum og avlamispensjónistum skattafría, og at landskassin endurrindar kommununum tað, ið tær harvið missa. Roknað er eisini við, at hækka botnfrádráttirnar fyri ávikavist kommunuskatt og landsskatt til kr. 15.000 og kr. 30.000. Frádrátturin fyri rentur verður 13% í kommunu-

skattinum og 12% í landsskattinum, svarandi til tað lækkaða skattaprosentið. Meðalskatta-prosentið fyri landsskatt er sett til 13. Uppskot mítt er, at skattatalvan verður hendan:

0 - 30.000	0%
30.000 - 150.000	10%
150.000 - 240.000 (12.000 av 150.000)	15%
240.000 - og yvir (25.000 av 240.000)	20%

Eftir hesum verður samlaði hægsti marginalskatturin 38%.

4. Fíggjarlógarviðurskifti.

Við eini lønarlækking og nógv lækkaðum landsskattaprosenti verður inntøka landskassans frá persónskatti væl lægri 1. árið. Her er lækkingin roknað til ca. 450 mió. kr. Sum frálíður, hækkar skattainntøkan aftur við óbroyttum skattaprosenti.

Hinvegin fara - um kostnaðarstøðið lækkar, og reallønin ikki lækkar - forbrúksgjøldini helst at hækka, sjálvt um meirvirðisgjaldið verður sett niður aftur á 23%.

Um tey tiltøk, sum nevnd eru her, verða sett í verk, er eingin vandi á ferð, um tað verður eitt ávíst hall á fíggjarlógini 1994. Tað verður vunnið inn aftur í 1995 og frameftir.

Fíggjarlógin fyri 1994 kann tí síggja soleiðis út (seinasta landsstýrisuppskotið við broytingum kostnaðarstøðinum):

Inntøkur:

1.	Inntøkuskattur	300.000
2.	Toll-, nýtslu- og framl. gjøld v.m.	808.000
3.	Onnur gjøld	16.000
4.	Inntøkur av spæli	1.000
5.	Rentuinntøkur	40.000
6.	Landsfyritøkur	13.000
7.	Partur av avlopi Tjóðbankans	810.000
9.	Ymsar inntøkur	1.000
		2.014.000

Útreiðslur:

10.	Løgtingið	10.000
11.	Meginfyrisiting	96.000
12.	Heilsumál	220.000
13.	Samferðsla og samskifti	35.000
14.	Útbúgving og gransking	245.000
15.	Mentan	30.000
16.	Fiskivinna, sigling v.m.	100.000
17.	Landbúnaður	20.000
18.	Vinnulív og arbeiðsmarknaður	47.000
19.	Almanna- og fbúðamál	693.000
20.	Pensjónsútreiðslur	10.000
21.	Effektivar veðhaldsbindingar	95.000

22.	Rentuútreislur	553.000
23.	Óvissar útreiðslur	0
	Viðlíkahald	50.000
	Íløgur	100.000
		2.304.000
Inntøkur		2.014.000
Útreiðslur		2.304.000
		390.000

Minniinntøkurnar í hesum uppskoti stava frá:

Minni skattainntøku	- 450
Avtøku fíggjarognargj. 1994	- 150
Meira innt. forbrúksgj.	+ 40
	- 560

Av tí at ein so stór broyting skal frentjast á fíggjarliga økinum, við nógvum lógarbroytingum á øllum samfelagsøkjum, verður mett, at ráðiligast er, at framleingja verandi fíggjarlóg fram til 28. februar 1994, fyri síðani at hava alla skipanina klára og seta hana í verk frá 1. mars 1994 at rokna.

Út frá hesum verður sett fram soljóðandi uppskot til fyribils fíggjarlóg:

IV **U p p s k o t**

til

løgtingslóg um fyribils játtanarlóg fyri 1994.

§ 1. Til fíggjarlógina fyri fíggjarárið 1994 er samtykt, verður landsstýrinum heimilað at uppkrevja skattir og gjøld eftir galdandi lógum. Landsstýrinum verður heimilað í sama tíðarskeiði at rinda nevðugar útreiðslur soleiðis, at landshúsarhaldið ótarnað kann fara fram, og átiknar skyldur verða hildnar.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1994 og fer úr gildi 28. februar 1994.

lagtingslov om midlertidig bevillingslov for 1994.

§ 1. Indtil finansloven for finansåret 1994 er vedtaget, bemyndiges landsstyret til at opkræve skatter og afgifter efter gældende love. Landsstyret bemyndiges til i samme tidsrum at afholde nødvendige udgifter således, at landshusholdningen uforstyrret kan fortsætte og påtagne forpligtelser opfyldes.

§ 2. Denne lov træder i kraft den 1. januar 1994 og ophæves 28. februar 1994.

5. Vinnulívsbroytingar.

Vinnulívið hevur verið fyri stórum broytingum seinastu árini. Tíverri hevur tað mesta verið negativt við minkandi sølu og framleiðslu, men effektivisering er eisini farin fram, og tað verður ein hjálp í framtíðini. Lækkingin av partafelagsskattinum fer eisini at hava stóran týdning í framtíðini.

Sanering er eisini farin fram og fer eisini í framtíðini at verða gjørd. Tá útlitini batna, verður eisini lættari at sanera.

Tað mest týdningarmikla fyri vinnuna er tí:

1) Kostnaðarstøðið lækkar, og harvið kappingarførið batnar.
2) Partafelagsskatturin verður verandi á lágum støði (22%).
3) Eingi nýggj avgjøld verða løgd á vinnuna.
4) Líkinda fíggingarmøguleikar verða í framtíðini.
5) Skilagóð sanering fer fram í núverandi støðu.
6) Hildið verður fram og fast við effektiviseringar.

Tað er eisini av stórum týdningi, at valmøguleikar verða viðvíkjandi fígging. Bankarnir eiga tí ikki at verða lagdir saman.

P/f Fiskavirking eigur at verða avtikin og virkini seld aftur fyri niðurskrivaða prísin til gomlu eigararnar ella aðrar.

Handilskvotur eiga ikki at verða settar í verk. Skilagóð stovnsrøkt fæst á annan hátt, sum royndir longu hava verið gjørdar við, t.d. legudøgum.

Neyðugt verður alla tíðina at bøta um okkara handilsviðurskifti við ES og aðrar fyri at tryggja okkara kappingarføri.

Av stórum týdningi er eisini, at sum frálíður, og vinnan og samfelagið aftur vinna pening, at almenni sektorurin ikki aftur veksur. Skattatrýstið má framhaldandi haldast niðri á tí støði, sum nevnt er frammanfyri.

6. Sethúsalánsviðurskifti.

Arbeiðsgevarar uttanfyri almenna sektorin koma eftir uppskotinum um lønarniðurskurð at spara umleið 700 mió. kr. av teim núverandi 2 mia. kr. teir gjalda í lønum.

Fyri at hjálpa um hjá sethúsaeigarum, sum í verandi støðu eru í fíggjarligari neyð, verður skotið upp, at ein partur av teirri lønarsparing, hesir hava, verður sett í ein serligan grunn, sum skal hjálpa til at sanera núverandi sethúsaskuld.

Um lønarútreiðslan hjá privatum arbeiðsgevarum verður áløgd eitt ávíst prosentgjald av nýggju lønini til grunnin, er sparingin kortini stór hjá teimum.

Til dømis kann rindast soleiðis:

1. árið 12,5% av 65% = 73,125%	spart 26,875%
2. árið 10,0% av 65% = 71,5%	spart 28,5%
3. árið 7,5% av 65% = 69,875%	spart 30,125%
4. árið 5,0% av 65% = 68,25%	spart 31,75%
5. árið 0,0%	spart 35,0%

Í beinleiðis upphæddum kann hetta væntast at verða.

1. árið 12,5% av 1.9 mia. kr. = 237 mió. kr.
2. árið 10,0% av 2,5 mia. kr. = 250 mió. kr.
3. árið 7,5% av 2.8 mia. kr. = 210 mió. kr.
4. árið 5,0% av 3,0 mia. kr. = 150 mió. kr.

847 mió. kr.

Hesin peningur eigur at verða nýttur til at endurreisa lánstovnunum eina saneringsniðurskriving, teir eiga at gera beinanvegin mótvegis øllum núverandi sethúsalánum. Hendan niðurskriving, sum skal vera endalig, kundi sæð soleiðis út:

1. veðrætt 10% av ca. 2.400 mió. = 240 mió. kr.
2. veðrætt 20% av ca. 1.500 mió. = 300 mió. kr.
3. veðrætt 30% av ca. 900 mió. = 270 mió. kr.
4. veðrætt 30% av ca. 600 mió. = 180 mió. kr.

5.500 mió. = 990 mió. kr.

Munin millum tær 990 mió. kr. og 847 mió. kr. koma 3. og 4. veðrættarhavararnir at avskriva sjálvir.

Fyri sethúsaeigararnar hevði tað havt stóran týdning, at teir sluppu av við umleið 17% av síni lánsskuld. Tað má eisini vera rætt at gera skipanina fyri øll sethúsalán, og at hon eisini umfatar allar veðrættir, tó mest teir uttastu.

Við hesum áliti og samanhoyrandi uppskoti vil fólkaflokkurin hvetja á allar flokkar á Føroya løgtingi um at taka saman hendur fyri at bjarga føroyska samfelagnum. Fíggjarlógaruppskotið, sum liggur frammi til avgreiðslu saman við tí ógvusliga skattatrýstinum á minkandi virksemi, køvir seinasta lívsneistan í samfelagnum. Latið okkum royna loysnina, sum kann bjarga okkum.

Tað er sjálvandi landsstýrið, ið skal standa fyri tí praktiska at fremja broytingarnar, men rættast er, at eisini umboð fyri løgtingið eru við í arbeiðnum, og tí verður sett fram soljóðandi

V

U p p s k o t

til
samtyktar

Løgtingið setir nevnd við umboði úr øllum flokkum á tingi at hjálpa landsstýrinum við arbeiði tess at umskipa samfelagsbúskapin, sum skotið er upp frammanfyri.

Eln annar minniluti (Flemming Mikkelsen) førir fram:

Tað tykist, sum um fyrrverandi og núverandi landsstýri hava mist tamarhaldið á teim føroysku fíggjar- og búskaparligu viðurskiftunum.

Uppruna fíggjarlógin fyri 1992, ið varð samtykt fyri jól í 1991, skuldi hava eitt hall upp á

91 mió. kr. aftan á íløgur.

Nakað seinni gjørdist greitt, at hesar ætlanir fóru ikki at halda, og tað verri enn so.

Úrslitið varð tann sokallaða "endurskoðaða fíggjarlógin" við einum mettum halli upp á 256 mió. kr.

Við ársenda varð eykafíggjarlóg við tí endamáli at fáa heimildir til tær npphæddir, ið tá víktu frá endurskoðaðu fíggjarlóginí samtykt.

Hesar upphæddir gjørdust risastórar skeiva vegin.

Verður farið til fíggjarlógina fyri 1993, t.v.s. í inniverandi ári, so var gongdin ikki stórt mætari enn árið fyri.

Ikki minni enn tvær framløgur vóru, ein órealistisk og tann sonevnda realistiska. Boðini frá forsætismálaráðharranum vóru, at nú skuldi javnvág fáast í. Hesar treytir eru seinni sleptar.

Endaliga úrslitið av hesum realitetum kenna vit ikki enn, men givið er, at ódámliga gongdin hevur hildið fram.

Nú komið var fram til viðgerðina av fíggjarlógini fyri 1994, valdar sami ruðuleiki.

Málið varð lagt fram í løgtinginum til ásettu tíð, 31. august 1993. Uppskotið vísti tá eitt hall upp á slakar 250 mió. kr. aftaná íløgur.

Á tingfundi 14. september, har løgmansrøðan og fíggjarlógin vóru til viðgerðar, bað minnilutin um at fáa viðgerðina av fíggjarlógini útsetta, inntil góðkenningin, ríkisstjórnin hevði tryggjað sær, fyrilá. Hetta varð ikki eftirlíkað.

Fáar dagar seinni gjørdist greitt, at hallið kom at verða 300 mió. kr. størri enn roknað varð við, umleið tær 540 mió. kr.

Sambært avtaluni frá 12. oktober 1993 góðkennir ríkisstjórnin ikki føroysku fíggjarlógina, men áleggur landsstýrinum at finna meirinntøkur og minni útreiðslur svarandi til 250 mió. kr.

Samstundis varð gjørt landsstýrinum púra greitt, at eitt komandi hall á fíggjarlógini varð ikki fíggjað, hvørki við ríkisláni ella ríkistrygd.

Hetta førdi við sær, at 19. og 20. oktober varð enn eina ferð ein røð av inntøkulógum løgd fyri løgtingið, leitað varð í hvørjum króki at finna nakrar krónur.

Ímeðan hevur landsstýrið í nærum tveir mánaðir trilvað seg fram til eina minniútreiðslu upp á 100 mió. kr. í mun til uppruna uppskotið.

Fyri viku síðani varð endurskoðaða uppskotið handað fíggjarnevndini.

Hetta hevur darvað arbeiðnum í fíggjarnevndini almikið við teimum avleiðingum, at eingin verulig viðgerð av fíggjarlógini er farin fram. Hetta er átaluvert.

Rættast hevði tí verið, at endurskoðaða uppskotið varð lagt fram í løgtinginum og harvið fingið eina nýggja fyrstu viðgerð av komandi fíggjarlóg, nú umstøðurnar eru so nógv broyttar.

Løgtingið og fíggjarnevndin áttu at tikið sær tíð til at viðgjørt komandi fíggjarlóg so seriøst sum til ber soleiðis, at vit ikki aftur um stutta tíð rena okkum fastar.

Ímeðan átti løgtingið, nú nýggja árið tekur við, at samtykt eina bráðfeingisfíggjarlóg, heldur enn at skunda eitt illa fyrireikað uppskot ígjøgnum. Samsvarandi hesum setir minnilutin fram soljóðandi

VI a **U p p s k o t**

til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at framleingja verandi fíggjarlóg til 1. februar og seta nýggja fíggjarlóg í gildi frá hesum degi.

Minnilutin ivast stórliga í, um endurskoðaða uppskotið er borðbært. Orsøkirnar eru fleiri.

Uppskotið vísir fyribils eitt hall upp á 263 mió. kr. Hóast landsstýrismaðurin í fíggjarmálum í viðmerkingunum til fyrra uppskotið royndi at bifla sær sjálvum og okkum øðrum inn, at ríkisstjórnin kom at veita trygd fyri landskassahalli 5 til 6 ár framyvir, so er sum sagt, gjørt púra greitt, at hetta verður av ongum.

Sum kunnugt hevur landskassin einki kredittvirði, tað fáast ikki lán til nakað sum helst uttan við ríkistrygd og ríkisloyvi.

Spurningurin er, hvussu ætlar landsstýrið at tíggja komandi hall?

Tað, sum landsstýrið leggur upp til viðvíkjandi hallinum á komandi fíggjarlógum er, so ótrúligt tað ljóðar, at fíggja hesi við føroyskum láns- og virðisbrøvum við landskassatrygd.

Haraftrat kemur, at við einum ótolandi arbeiðsloysi, einum tómum arbeiðsloysiskassa, einari ókendari fólkaflyting av landinum, einar almennari rentubyrðu á veg móti milliardini, einum ruðuleikakendum fiskivinnupolitikki, har dagliga verður hótt við, at allur flotin verður lagdur o.s.fr., eru vit so nær eini katastrofu, at spurningurin er helst bert um tíð, nær aðrir myndugleikar kenna seg noyddar at seta tiltøk í verk.

Undir so høpisleysum umstøðum ber als ikki til at viðgera og tilevna eina seriøsa og realistiska fíggjarlóg.

Samsvarandi omanfyristandandi setir minnilutin fram

VI b

U p p s k o t

til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við ríkisstjórnina viðvíkjandi hættisligu støðuni í landinum.

Ein grundleggjandi umskipan av øllum samfelagnum er neyðug. Endamálið má vera at fáa vinnutólini at virka aftur.

Kostnaðarstøðið í samfelagnum og kappingarførið viðvíkjandi marknaðarviðurskiftum okkara eiga at takast upp til gjølliga viðgerð. Minnilutin setir tí fram

VII

U p p s k o t

til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum skjótast gjørligt at taka upp samráðingar við ES viðvíkjandi handils- og tollviðurskiftum okkara, har serligur dentur verður lagdur á framleiðslu úr triðjalandsrávøru.

Álagdi rentuskatturin, sum helst fer at medvirka til eitt hægri rentustøði, eigur at viðgerðast av nýggjum og 0-stillast. Somuleiðis er neyðugt at taka MVG-avgjaldið til nýggja viðgerð, serliga hvat neyðsynjarvørum viðvíkir.

Hesi og onnur viðurskifti í samfelagnum mugu fáast í rættlag, áðrenn talan kann vera um at fáa eina fíggjarlóg at hanga saman og harvið aftur vinna okkum álit uttanfyri landoddarnar soleiðis, at tað aftur verður áhugavert at búgva í hesum landinum.

Hin triði minnilutin (Tordur J. Niclasen) førir fram:

Í sambandi við avtaluna frá 12. oktober 1993 var eitt av treytunum frá danskari síðu, at "landsstyret inden udgangen af 1993 gennemfører yderligere budgetforbedringer på mindst 250 mio. kr. i forhold til det fremsatte finanslovforslag for 1994. Budgetforbedringerne omfatter både indtægts- og udgiftssiden."

Sostatt hevur landsstýrið fyri stuttum handað fíggjarnevndini uppskot til broytingar, sum meirilutin í nevndini (samgonguflokkarnir) stórt sæð hevur tikið til eftirtektar og bygt inn í broytingaruppskotið til uppruna uppskot landsstýrisins frá 31. august 1993.

Úrslitið av broytingaruppskoti meirilutans er ein fíggjarlóg, sum gevur eitt hall upp á kr.

261.589.000!

Hetta hall kann tykjast stórt - og er tað eisini, men sum støðan í samfelagnum er í dag, slepst valla undan halli!

Nú danir eisini eru komnir inn í myndina, hvat fíggjarlógini viðvíkir, fer úrslitið vónandi at roynast betri enn undanfarin ár!

Undanfarin ár hava verið merkt av stórum halli á fíggjarlógini.

1989 varð hallið 517 mió. kr.
1990 varð hallið 520 mió. kr.
1991 varð hallið umt. 550 mió. kr., hóast roknað varð við 350 mió. kr.
1992 varð hallið 461 mió. kr., hóast bert varð roknað við 92 mió. kr. í halli.

Fíggjarlógin 1993 skuldi eftir ætlan geva eitt avlop upp einar 29 mió. kr., men kemur at geva eitt hall upp á fleiri 100 mió. kr.

Soleiðis hevur verið húsast, og tí kann av røttum sigast, at um hallið á fíggjarlógini "bert" verður tær 261 mió. kr., so er hetta hóast alt ein munandi betring tann rætta vegin!

Hóast tað var "eitt satt formoyilsi" hjá teimum báðum at vera saman - fólka- og javnaðarflokkinum, so gjørdist hetta politiska eksperimentið ein sannur sorgarleikur fyri føroysku tjóðina og fólkið, ið her búleikast. Tað tyktist, sum hesir ikki skiltu, hvat rørdist í samfelagnum, og hvussu fólkið hevði tað.

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 1992 varð m.a. sagt:

"Landsstýrið roknar við eini ávísari búskaparligari framgongd, sum er byrjað nú seinru helvt av 1991. Henda framgongd hevur sítt grundarlag í, at ein ávís sanering er farin fram av føroyska vinnulívinum, at fiskivinnan er liberaliserað við fríari prísáseting og uppboðssølu, at almenna nýtslan er lækkað, at lønarkostnaðurin og annar kostnaður í samfelagnum ikki er nógv hækkaður og í fleiri førum lækkaður, og at nýggja handilsavtalan við EF saman við í løtuni góðum útflutningsprísum gevur betri møguleikar fyri lønsemi hjá vinnuni..."

Tíverri hevur tað ikki gingist soleiðis, sum her varð mett!

Sosialistiska samgongan millum tjóðveldisflokkin, javnaðarflokkin og sjálvstýrisflokkin hevur ei heldur gagnað tí fólki, ið her búleikast - og kemur heldur ikki at gera tað!

Úrslitið higartil er, at vinnulívið er monopoliserað, hægri skattir og hægri avgjøld eru løgd á borgaran, ognarskattur (rentuavgjald og fíggjarognaravgjald) er settur í verk o.s.fr., o.s.fr.

Fólkið knógvar undir byrðum, tey áður ikki hava kent, fleir og fleir gerast arbeiðsleys, missa hús og heim ella rýma av landinum.

Skattgjaldarin er skuldarbundin fyri milliarda upphæddir, sum bankarnir hava fingið at umsita, og má hesin sami borgarin, saman við politikarunum, standa og hyggja at, meðan

hesin peningur, sum skuldi vera við at seta gongd aftur á samfelagið, verður sendur "retur", inntil teir báðir donsku bankarnir (við føroyskum skattgjaldara peningi) hava við egnum eygum sæð okkurt "bæredygtigt projekt med en rimelig fornuftig egenkapital".

Hesir eru teir, sum í roynd og veru stýra samfelagi okkara, og sum koma at mynda samfelagið - tað veri seg bæði, hvat vinnuni á sjógvi og landi viðvíkur.

Henda myndugleika hevur landsins stýri í roynd og veru givið teimum!

Eftir er bert at vóna, at úrslitini gerast betri, enn tá politiski myndugleikin ráddi!

Hinvegin, kann ein av røttum spyrja, er hetta nakað, sum tann politiski myndugleikin í longdini kann liva við?

Avleiðingarnar av førda sosialistiska politikki eru alt annað enn bjartar, og stúrir minnilutin (Tordur J. Niclasen) fyri, at um landsstýrið og bankarnir ikki taka annað skinn um bak, so gerast seinastu metingarnar frá Føroya Iðnaðarfelag um vaksandi arbeiðsloysi fyri 1994 (og 95) veruleiki:

Hesir eru at:

-Handilslívið doyr næstan út	uml. 300 fólk missa arbeiði
-Handverksvinnan doyr	uml. 300 fólk missa arbeiði
-Heimaiðnaðurin doyr	uml. 200 fólk missa arbeiði
-Figgjarstovnarnir skerjast	uml. 150 fólk missa arbeiði
-Almenni sektorurin skerjist	uml. 400 fólk missa arbeiði
-Onnur tænastuvinna	uml. 200 fólk missa arbeiði
-Alivinnan doyr næstan út	uml. 500 fólk missa arbeiði
Tilsamans	uml. 2050 fólk missa arbeiði

Hetta landsstýrið hevur sagt oftari enn onnur, at uppgávan hjá politikarum er "at skapa fortreytir hjá vinnulívinum at virka undir".

Teir, ið fáast við iðnaðin og sostatt hava fingurin á pulsinum, hava ilt við at siggja nakrar glottar og nakað uppbyggjandi við førda politikkinum, men staðfesta, at landið í løtuni ikki hevur politiskt skynsemi ella politiskan kapasitet til at greiða landsins ovurhonds trupulleikar.

Øll orka átti at verið løgd í at komið tí nívandi arbeiðsloysinum til lívs ella ið hvussu so er, at gjørt, hvat ið gerast kann til tess at minka um hetta.

Hóast tað er positivt, at "oyramerkt" upphædd er sett av til "vinnufremjandi virksemi", so er at harmast yvir, at landsstýrið ætlar skerjingar á øðrum konti, sum hava arbeiðsskapandi týdning.

Í apríl mánaða 1993 varð lóg lýst um "fløgustuðul til alivinnuna". Sambært hesi lóg er heimild at veita alarum ein tíðaravmarkaðan íløgustuðul, sum verður veittur sum stuðul til smoltkeyp fyri at elva til neyðugar umstruktureringar og umleggingar innan alivinnuna. Stuðulin verður givin í eitt tíðarskeið upp á 3 ár, og heimilar landsstýrinum fyri árini 1993,

1994 og 1995 at veita stuðul til útseting av í mesta lagi 5 mió. smolt.

Stuðulin, sambært hesi lóg, er í meðal kr. 5,- pr. smolt.

Sambært uppskotinum frá fíggjarlógaruppskoti fyri 1994 eru bert 15 mió. kr. settar til hetta endamál, og hevur landsstýrið ætlanir um at lækka henda stuðul til kr. 3,- pr. smolt.

Hetta er sera óheppið og kemur helst at geva einum stórum parti av vinnuni mønustingin!

Eisini er tað átaluvert, um landsstýrið solciðis broytir lógir, sum onnur skifta hosur.

Umráðandi er, at vinnan kann føla seg trygga og laga sítt virksemi eftir lógum, ið lýstar eru at galda eitt ávist áramál. Hetta er ein grundleggjandi meginregla, sum landsstýrið ikki eigur at fáa loyvi til at fara lætt um!

Alivinnan er ein útflutningsvinna, sum hevur arbeiðsskapandi búskaparligan týdning, og er tað tí heilt burturvið í hesum torføru tíðum at leggja stein oman á byrðu hjá hesi vinnu.

Um landsstýrið í eini "løtuvinnings roynd" vil spara tær 10 mió. kr., ið tørva, kann her skjótt "missast meir fyri minni".

Samsvarandi hesum verður sett fram soljóðandi

VIII **U p p s k o t**

til
samtyktar

Heitt verður á landsstýrið at sleppa ætlanunum um at minka iløgustuðulin til alivinnuna.

Hvat játtanini til praktiskar fiskiroyndir viðvíkir er at harmast yvir, at henda er lækkað við kr. 2 mió.

Undir viðgerðini í fíggjarnevndini hevur verið ført fram, at ov lítið - fyri ikki at siga einki - samskifti er millum vinnuna og fiskivinnuumsitingina.

Hetta eigur ikki so at vera! Skal nakað skilagott spyrjast burturúr hesi játtan, so er tað umráðandi, at vinnan verður tikin upp á ráð og verður við at avgera og seta út í kortið, hvussu hesin peningur gagnligast verður nýttur.

Sostatt verður skotið upp soljóðandi

IX **U p p s k o t**

til
samtyktar

A. **Heitt verður á landsstýrið at taka neyðug stig til at menna samskiftið millum**

fiskivinnuumsitingina og vinnuna.

B. Játtanin til praktiskar fiskiroyndir verða at umsita í samráð við vinnuna.

Hvat fiskivinnuni annars viðvíkir, so má havast í huga, at útróðrarmenn serliga hava verið fyri bakkkasti. Vána veður, lítil og eingin fiskiskapur og vantandi inntøkutrygd hevur rakt hesar og familjur teirra sera meint.

Fyri uml. ári síðani heitti undirritaði á landsstýrið at gera broytingar í lógini um arbeiðsloysisskipanina soleiðis, at henda eisini kom at galda útróðrarmenn, sum jú guldu til skipanina.

Nógv hevur verið tosað, men enn hevur útróðrarmaðurin ikki merkt nakran bata.

Átaluvert er tað, at landsstýrið enn einki hevur gjørt til tess at bøta um vána støðu útróðrarmanna, og verður tí nú sett fram soljóðandi

X

U p p s k o t

til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum beinanvegin at taka neyðug stig til, at útróðrarmonnum verður veitt inntøkutrygd.

Hvat kvotuni cystanfyri viðvíkir, er at fegnast um, at ein munandi hækking er fallin føroyingum í lut.

Umráðandi er, at landsstýrið sær týdning av, at línuskipini fáa sín bróðurpart av hesi kvotu. Serliga, tá hugsað verður um, at møguleikarnir hjá línuskipunum eru minkaðir nógv við Føroyar.

Hvat kvotabýtinum undir Føroyum viðvíkir, ljóðar nú, at landsstýrið hevur slept uppruna ætlanini og nú givið húka- og línuveiðuni betri sømdir.

Tað er alla æru vert, tá landsstýrið tekur við ráðum og sleppur sínum egnu ætlanum!

Hvat játtanini "Inntøkutrygd til fiskimenn" (§ 19) viðvíkir, so varð henda fyri fíggjarárið 1993 hækkað við kr. 2,8 mió. Henda viðbót varð ætlað sum serlig viðbót fyri telefonútreiðslur hjá langfarafiskimonnum.

Játtanin "Inntøkutrygd til fiskimenn" er í uppskotinum fyri 1994 sett til 87 mió. kr. Tó sæst ikki, hvørki í uppskoti landsstýrisins, ei heldur í uppskoti meirilutans, at nakað av hesi upphædd er ætlað til viðbót fyri telefonútreiðslur.

Hetta er at undrast yvir, og verður tí roynd gjørd millum 2. og 3. viðgerð at fáa lagt fram uppskot um ávísa upphædd til nevnda endamál.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) undrast yvir, at landsstýrið og meirilutin í fíggjarnevndini ikki hava sett meir enn 10 mió. kr. av til Húsalánsgrunnin.

Tá løgtingsmál nr. 28/1993: Veðhald fyri lánum til Húsalánsgrunnin - var til viðgerðar í fíggjarnevndini, og ein samd nevnd tók undir við landsstýrinum kom í álitinum frá fíggjarnevndini m.a. at standa:

"Upplýst varð, at umframt tær 10 mió. kr., sum játtaðar eru Húsalánsgrunninum á landsstýrisuppskotinum til fíggjarløgtingslóg fyri 1994, skal grunnurin hava helmingin av teim 30 mió. kr. til almennar grunnar, sum nevndar eru í avtaluni millum ríkisstjórnina og føroya landsstýri frá 12. oktober 1993. Landsstýrismaðurin helt, at játtanin til Húsalánsgrunnin eigur at koma upp á einar 80 mió. kr., t.v.s. at enn resta 55 mió. kr. í. Víðari segði landsstýrismaðurin, at landsstýrið fer at royna at ávísa sparingar á fíggjarløgtingslógini fyri 1994 soleiðis, at nevnda uppnædd verður fingin til vega.

Viðvíkjandi støðuni hjá sethúsaeigarum varð upplýst, at arbeitt verður við at samskipa saneringina av sethúsalánum soleiðis, at allir lángevarar (sparikassarnir, bankarnir og húsalánsgrunnurin) koma at arbeiða saman í hesum spurningi.

Fyri at Húsalánsgrunnurin skal luttaka í hesum, er neyðugt at styrkja um fíggjarstøðu grunsins soleiðis, sum landsstýrismaðurin mælir til. Nevndin tekur eisini undir við, at arbeiðið við at sanera sethúsalán verður samskipað..."

Fortreytin fyri, at Húsalánsgrunnurin kann luttaka í hesar neyðugu sanering er, at fíggjarstøða grunsins verður styrkt. Tað er sambært uppskoti meirilutans ikki hent, og kann ein tí av røttum koma til ta niðurstøðu, at so verður Húsalánsgrunnurin ikki við í nakrari sanering og vandi sostatt fyri at hinir fíggingarstovnarnir heldur ikki verða tað, og tann ætlaða samskipaða saneringin tí heldur ikki gerst veruleiki.

Havast skal í huga, at úttalilsini frá landsstýrismanninum og niðurstøðan hjá eini samdari fíggjarnevnd kom bert fyri einum mánaða síðani.

Hvat samferðsluni viðvíkir hevur meirilutin í fíggjarnevndini skotið upp at hækka játtanina 1 mió. kr. í mun til tilmæli landsstýrisins. Umráðandi er, at henda milliónin verð skilagott nýtt og kemur teim at gagni, sum í støran mun eru við skerdan lut í samferðslumynstrinum. Tí verður skotið upp soljóðandi

XI Uppskot

til
samtyktar

Heitt verður á landsstýrið at nýta hesa millión soleiðis, at túratalið á Suðuroyar siglingini hækkar.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) harmast um, at fortreytirnar fyri einum virksamum rúsdrekkapolitikki hava fingið eitt skot fyri bógvin. Játtanin er lækkað við 1.5 mió. kr. og sett til 9,5 mió. kr., sum er kr. 450.000 minni enn játtanin fyri 1993.

Hetta er at undrast yvir - serliga tá hugsað verður um, at tá nýggja rúsdrekkalógin varð samtykt, varð í samtykta álitinum boðað frá, at:
"Tað almenna her og nú eigur at sýna viðgerðar- og eftirviðgerðarspurninginum nógv størri ans, enn gjørt hevur verið higartil. Hetta merkir so aftur, at tingið eigur at játta størri upphæddir til viðgerð og eftirviðgerð av rúsdrekkamisnýtarum.." Somuleiðis varð áherðsla løgd á, at "meiri peningur eigur at verða játtaður til upplýsingar- og fyribyrgingarvirksemi.."

Uppskot til samtyktar, har álagt varð landsstýrinum at seta í verk hóskandi tiltøk við tí endamáli at minka um rúsdrekkanýtsluna í Føroyum varð samtykt við 23 atkvøðum.

Tað, sum nú hendir, er beint í stríð við nevndu løgtingssamtykt og sigur frá, at líkasæla tykist at valda á hesum øki.

Havast skal í huga, at Rúsdrekkasøla landsins er sett at hava eitt rakstraravlop upp á kr. 11,6 mió. Umframt hesa upphædd fær landskassin einar kr. 70 mió. inn í punktgjøldum júst í samband við rúsdrekka.

Sær landsstýrið seg ikki fært fyri at seta neyðuga upphædd av til fyribyrgjandi/viðgerðarlig tiltøk, ja, so er einki annað til at taka enn ávíst gjald av útsøluprísinum, sum fer beinleiðis í grunn - ætlað til fígging av viðgerðum/fyribyrgjandi tiltøkum.

Samsvarandi hesum verður tí skotið upp soljóðandi

XIII

U p p s k o t

til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at seta í verk skipan, har ávís upphædd av útsøluprísinum av øli, víni og brennivíni fer í grunn til fígging av arbeiðnum móti rúsdrekkamisnýtslu.

Tað, at ein samlað játtan nú verður givin, sum eftir tilmæli frá Rúsdrekka- og narkotikaráðnum skal játtast av landsstýrinum til m.a. stovnarnar, tykist at verða løgin mannagongd.

Stovnunum átti ið hvussu so er at verið tryggjað ein játtan á sjálvari løgtingsfíggjarlógini eftir uppskoti frá t.d. landsstýrinum og eftir einum býtislykli, sum t.d. landsstýrið hevði tikið avgerð um.

Hvat játtanini til § 14 viðvíkir sæst, at maskinskúlin enn einaferð verður við skerdan lut - bæði hvat rakstri og íløgujáttan viðvíkir. Henda útbúgving tykist at fáa eina lága prioritering í mun til aðrar játtanir á somu grein. Landsstýrið eigur at verða mint á, at tá sjálvsognarstovnurin varð avtikin, var tað eisini við teirri treyt, sum landsstýrið góðtók, at skuldin skuldi byggjast. Var viljin til staðar, so vóru tær 5 mió. kr. standandi, og útlit vórðu tá fyri, at henda útbúgving fekk frægari umstøður at virka undir enn higartil.

Hvat rakstrinum viðvíkir, kunnu kr. 400.000 t.d. flytast av konti hjá skúlabókagrunninum (innrætting), tá havast skal í huga, at stovnsleiðarin her alment hevur sagt seg ikki hava brúk fyri hesum peningi.

Sostatt kann játtanin til rakstur av maskinskúlanum hækkast við nevndu kr. 400.000 uttan at tað nervar nakran - ei heldur hevur meirjáttan við sær.

Fólkaskúlin hevur tað trongligt í hesum døgum og verður nú skerdur uppaftur meiri - við nærum 2 mió. kr.

Hendan meir ella minni tilvildarliga skerjingin - nakað her og nakað har - er ógagnlig, og eigur tí landsstýrið nú at gera av, hvørt ávísir útbúgviugarstovnar skulu niðurleggjast soleiðis, at teir, sum eftir eru, hava nøkulunda livilíkindi.

"Plenuklipparametodan" ger størri skaða enn gagn, lækkar útbúgvingarstøðið til ógagns fyri ungdómin.

Tá skerjingar á fíggjarlóg skulu fremjast, er vandi fyri at tey, sum veikast eru í samfelagnum, koma at kenna sviðan meinast. Hesum eigur at ansast eftir, at so ikki verður.

Tí er at harmast um, at játtanin - øll sum hon er - til Bústovnar (serforsorg) er skorin hurtur.

Arbeiðsloysisskipanin er komin í fíggjarliga trongsstøðu, og tykist eingin somja at vera um, hvussu hesi skipan kann verða lív lagað. Mong hava ikki nóg mikið til dagliga húsarhaldið, og er tað tí heilt burturvið at tosa um at lækka útgjaldið niður á 50%. Støðan tykist sera trupul, men hevur ljóðað, at danir skilja hesa sera hættisligu sosalu støðu, ið rakar ein stóran part av føroyingum, um skipanin "dettur saman". Her liggur stór ábyrgd hjá landsstýrinum at taka neyðug stig til, at skipanin ikki "dettur sundur".

Tá samfelagið er í búskaparligari undantaksstøðu, verður neyðugt hjá politisku myndugleikunum at fremja ótraditionellar loysnir. Skulu vit gera okkum tankar um at kappast við marknaðin uttanfyri Føroyar, so má kostnaðarstøðið lækkast. Føroyska vinnulívið hevur so langt í frá somu fortreytir at kappast sum útlendsku kappingarneytarnir.

Fyri at fremja sparingar á løgtingsfíggjarlógini og at fáa kapital til at betra um fortreytirnar hjá vinnuni, hevur minnilutin áður skotið upp at seta inntøkuloft pr. húski. Uppskotið vann ikki frama!

Minnilutin hevur áður ført fram, at lønarlækking ikki kann koma upp á tal uttan so er, at skatturin lækkar, avgjøld lækka og ein haldbær avtala fæst við peningastovnarnar um skuldarviðurskifti. Hvat lønum viðvíkir, er spurningurin um reallønina alt avgerandi, um verkafeløgini vilja viðvirka til at fáa fram eina lækking í kostnaðarstøðinum.

Eitt betri kappingarføri vildi avgjørt havt við sær, at fleiri arbeiðspláss vórðu skapt, og at gongd kom í aftur tann rætta vegin.

Tf verður skotið upp soljóðandi

XIV **U p p s k o t**

til
samtyktar

Við atliti til at fremja eina lækking í kostnaðarstøðinum verður heitt á landsstýrið at taka upp samráðingar við verkafeløgini, vinnufeløg og figgjarstovnarnar - og um neyðugt við donsku stjórnina.

2. viðgerð 20. desember 1993. Broytingaruppskot meirilutans til § 1, 1201, 1215 og 1702, § 2, 2022 og 2017, §§ 3, 4, 5, 6, 7, 8, 9, 10, konto 10158 og 10177, § 11, § 12, konto 12026, 12109, 12202, 12907/303143, 12983 samtykt við 17-0 atkvøðum.

Broytingaruppskot meirilutans til § 13, 13265, 13089, 13094, 13056, 13018, 13061, 13023, 13037 og 13989, § 14, 14103, 14122, 14155, 14257, 14326, 14331, 14364, 14378, 14409, 14414, 14452, 14466, 144471, 14485, 14554, 14661, 14739, 14744, 14832, 14851, 14901 og 14915 samtykt við 17-0 atkvøðum. § 15, 323402 fall við 16-2 atkvøðum, kontoin verður sett á 0. Atkvøt varð við navnakalli.

Broytingaruppskot meirilutans til § 15, 15615, 15629, 15634, 15703, 15907, 323198, 323492, 323181, 323738 og 723937 samtykt við 17-0 atkvøðum. Broytingaruppskot meirilutans til § 16, 16469, 16488 og 16994, § 17, 17898, 17219 og 17307, § 18, 18109, 18166, 18235, 18361, 18532, skipabyggiendurgjald, 18598, 18601, 18653, íløgur, § 19, 19056, 19075, 19089, 19106, umsiting av hjálpitólum, 19607, 19892, 19904, 363557, 363557, 363565, 363628, 363669, 363797, 363835, 373305, 19994, bústovnar, uml. heim og røkstarheim Norðstr. samtykt við 17-0 atkvøðum. § 20 í landsstýrisins uppskoti samtykt við 17-0 atkvøðum. Broytingaruppskot meirilutans til § 21, 21019 samtykt við 17-0 atkvøðum. §§ 22, 26 og 27 í landsstýrisins upppskot samtyktar við 17-0 atkvøðum.

Uppskotini til samtyktar frá minnilutanum (Anfinn Kallsberg), I fall við 13-0, II fall við 12-0, III fall við 7-0, V fall við 7-0 atkvøðum, broytingaruppskot IV fall við 7-0 atkvøðum.

Uppskotini til samtyktar frá minnilutanum (Flemming Mikkelsen), VIa fall við 13-0, VIb fall við 7-0, VII fall við 12-0 atkvøðum.

Uppskotini til samtyktar VIII fall við 7-0, IX fall við 16-0, X samtykt við 20-0, XI full við 3-0, XIII fall við 11-0, XIV fall við 12-0 atkvøðum.

20. desember 1993 legði Svend Aage Ellefsen, løgtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot

til
samtyktar

Løgtingið samtykkir, at ferðaseðlakostnaðurin við Strandfaraskipum ikki skal hækkast í 1994.

Viðmerkingar

Sambært viðmerkingunum til broytingaruppskot meirilutans til uppskot landsstýrisins (sí fylgiskjal til álit meirilutans), er ætlanin hjá meirilutanum og landsstýrinum, at ferðaseðlaprísurin við strandfaraskipunum skal setast upp í komandi ári.

Havandi í huga hvussu dýrt tað er at ferðast hjá teimum, ið hava fyri neyðini at brúka strandfaraskipini, kann tað ikki haldast rætt, at hækka ferðaseðlagjaldið enn meira. Hjá teimum, sum ferðast til arbeiðis er talan um stóra meirútreiðslu, ið ikki longur kann dragast frá áðrenn skatturin skal roknast.

Haraftrat hevur ein hækking í prísinum bert við sær, at ferðafólkatalið lækkar, so meirinntøkan heldur gerst negativ enn positiv! Kanska hevði ein lækking heldur enn hækking givið meirinntøkur!

Um hugt verður í ársroknskapirnar hjá strandferðsluni sæst, at tað er rakstaravlopið av rutunum um Leirvíksfjørð og Vestmannasund, sum í stóran mun hava goldið siglingina til smáoyggjarnar og Suðuroynna. Tað er órættvíst, at krevja enn størri kostnað og enn størri avlop frá teimum, sum ferðast hesar leiðirnar, meðan onnur sum ikki brúka strandfaraskipini skulu sleppa undan tilsvarandi hækking í teirra livikostnaði.

Er tað meiningin m.a. at betra tænastuna til Suðuroyar og inn á Skálafjørðin, so eigur meirilutin/landsstýrið í fyrsta lagi at krevja sparingar/skynsemisbroytingar innan samlaða virksemið hjá Strandferðsluni. Í øðrum lagi eigur at verða álagt landsstýrinum at finna peningin aðrastaðni enn við taksthækkingum!

Haraftrat skulu tær stóru bygnaðarbroytingarnar, sum seinastu mánaðarnar eru framdar innan høvuðsvinnuna, havast í huga. Tað gerst sjónskari fyri hvønn dag, sum gongur, at útoyggjarnar serstakliga Vágar og Sandoy, verða sigidar aftanút vinnuliga meðan meginøkið lutfalsliga klárar seg betur. Ein hækking í takstunum hjá strandferðsluni fer at seta enn størri ferð á hesa óhepnu gongdina og avtofta hesar oyggjarnar rættuliga.

Uppskotið til samtyktar frá Svend Aage Ellefsen, løgtingsmanni um ferðaseðlakostnaðin fall við 12-0 atkvøðum. Atkvøtt varð við navnakalli.

21. desember 1993 vórðu niðanfyristandandi broytingaruppskot framløgd til 3. viðgerð.

Løgtingsmenninir Jógvan I. Olsen, Dan Petersen, Hans Tausen Olsen, Lasse Klein, Jógvan Sundstein og Niels Pauli Danielsen løgdu fram soljóðandi

broytingaruppskot

Í fíggjarlógini fyri 1994 verður sett sum:

Viðmerking
til § 16 16488 Praktiskar fiskiroyndir:
Til føroysk fiskifør, sum hava avreitt feskan fisk í 1992 og 93 og ikki fingu peningin úr Trygdargrunninum fyri avreiðingar og lønir, verða 50% av avreiðingarvirðinum útgoldin. Henda regla fer úr gildi 1. mai 1994.

Anmærkning
til § 16 16488 Praktiske fiskeriforsøg:
Til færøske fiskeskibe, som har indhandlet ferskfisk i 1992 og 93 og ikke har fået pengene af Garantifonden for indhandlinger og løn, udbetales 500% af indhandlingsværdien. Denne regel ophæves 1. maj 1994.

Viðmerkingar

Í 1992 og 1993 eru nógv flakavirki farin av knóranum, og í kjalavørrinum av hesi gongd komu fiskifør og serliga útróðrarbátar illa fyri, tí teir mistu peningin, teir høvdu avreitt fyri, og í mongum førum vísti tað seg, at eingin trygd var fyri hesar mistu pengar, hvørki í Trygdargrunninum fyri avreiðingar og lønir ella í Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna sum minstaløn ella minstiforvinningur. Her er sostatt ein bólkur, sum er dottin niðurímillum trygdarskipanina. Fyri at bøta um hesa vanlagnu, verður sett fram broytingaruppskot til fíggjarløgtingslógina 1994.

Uppskotið væntast at kosta 1-1,5 mió. kr.

Broytingaruppskotið varð samtykt við 18-0 atkvøðum.

Løgtingsmenninir Vilhelm Johannesen, Óli Breckmann, Johs. Ellefsen og Heini O. Heinesen løgdu fram soljóðandi

broytingaruppskot

Í uppskot landsstýrisins verður gjørd hendan broyting:

"§ 15

15907 Ymiskir studningar:
323402 Studn. til politiska upplýsing — kr. 2.500.000"
Tilsk.t.polit. oplysningsarbejde

Broytingaruppskotið varð samtykt við 19-2 atkvøðum.

Løgtingsmenninir Sverre Midjord, Mikkjal Sørensen, Jógvan I. Olsen, Heini O. Heinesen, Olaf Olsen, N. P. Danielsen, Lasse Klein og Tordur J. Niclasen løgdu fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í uppskoti landsstýrisins verður gjørd hendan broyting:

"§ 19

19904 Ymiskir studningar:
363652 Hjálpargr. f. óarb.før. fiskimenn kr. 400.000"
Fonden til uarbejdsdygtige fiskere

Broytingaruppskotið varð samtykt við 18-0 atkvøðum.

Løgtingsmenninir Jacob Lindenskov, Jógvan Sundstein, Lisbeth L. Petersen og N. P. Danielsen løgdu fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í staðin fyri § 19, konto 363565 í uppskot landsstýrisins verður sett:

"§ 19 363565 Blindastovnurin kr. 4.300.000"
(av játtanini eru til láns-
skyldur kr. 3.500.000)

Broytingaruppskotið fall við 16-0 atkvøðum.

Løgtingsmenninir Birgir Danielsen, John Petersen, Óli Breckmann, Tordur J. Niclasen og Flemming Mikkelsen løgdu fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

"§ 14 14409 Føroya Handilsskúli
verður hækkað við kr. 308.000
1 ára HH skeið
og sett til kr. 15.208.000"

Broytingaruppskotið fall við 8-0 atkvøðum.

Løgtingsmenninir Tordur J. Niclasen, John Petersen, Flemming Mikkelsen, N. P. Danielsen og Óli Breckmann løgdu fram soljóðandi

broytingaruppskot

"§ 14 14471 Føroya Maskinskúli
verður hækkað við kr. 400.000
og sett til kr. 6.400.000

§ 14 14991 313302 Skúlabókagr. innr.
verður lækkað við kr. 400.000
og sett til kr. 0"

Broytingaruppskotið fall við 15-0 atkvøðum.

Løgtingsmenninir Jacob Lindenskov, Lasse Klein, Jógvan I. Olsen, N. P. Danielsen og Óli Breckmann løgdu fram soljóðandi

broytingaruppskot

Í uppskoti landsstýrisins verða gjørdar hesar broytingar:

"§ 12 12907 Ymiskar útreiðslur:
303243 Viðgerð av rúsdrekkamisa. kr. 8.500.000

§ 19 19904
363598 Blákrossstovan kr. 100.000
363636 Fráhaldsfelagini kr. 450.000
363827 Hjálpargr. móti alkoholmisn. kr. 1.000.000"

Broytingaruppskotið fall við 14-0 atkvøðum.

Løgtingsmenninir Tordur J. Niclasen, Anfinn Kalisberg, Jógvan I. Olsen og N. P. Danielsen løgdu fram soljóðandi

broytingaruppskot

"§ 19 19873 Inntøkutrygd hjá fiskimonnum

Viðmerkingar

Av játtanini kr. 87.000.000 verða kr. 2.800.000 nýttar til serliga viðbót fyri telefonútreiðslur hjá langfarafiskimonnum."

Broytingaruppskotið fall við 16-0 atkvøðum.

Anfinn Kallsberg, løgtingsmaður legði fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Av tí, at fíggjarlógin fyri 1994, sum nú er samtykt við 2. viðgerð, ikki samsvarar við aðrar gjørdar viðtøkur á Føroya løgtingi, verður sett fram niðanfyristandandi broytingaruppskot til fíggjarlógina fyri 1994:

"§ 14 14991 - 313302

2. ársgjald til nýbygging av fólkaskúlanum verður hækkað við kr. 5.585.000 til	kr.	6.085.000
Íløgurnar settar til	kr.	6.785.000
§ 14 sett til	kr.	369.313.000

Víst verður til samtykt í løgtingsmáli nr. 2/1991: Fíggjarlóg 1992 og løgtingsmál nr. 34/1992: Fíggjarlóg 1993.

§ 16 16417 Studningur til fiskivinnuna

Íløgustuðul verður hækkaður við kr. 28.003.000 til	kr.	151.213.000

Vísst verður til løgtingsmál nr. 81/1992: Løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan.

§ 16 16904 - 333407 Tiltøk fyri alivinnuna

Upphæddin verður hækkað við kr. 10.000.000 til	kr.	25.000.000
§ 16 sett til	kr.	161.213.000

Vísandi til løgtingsmál nr. 167/1992 Íløgustuðul til alivinnuna er lógarbundin útreiðsla 5 kr. pr. smolt, sum verða útsett. Mett verður, at 5 mió. smolt verða útsett, og er lógin galdandi fyri 1993-94-95.

§ 17 17898 - 343013 Landbúnaðarstudningar

Játtanin verður lækkað við kr. 7.900.000		
§ 17 sett til	kr.	17.330.000

Vísst verður til løgtingsmál nr. 34/1992: Fíggjarløgtingslóg 1993. Uppskot til samtyktar nr. II, sum áleggur Føroya landsstýri til umskipan av stuðulsveitingum.

§ 18 18686 Vinnufremjandi virksemi

Játtanin verður lækkað við kr. 25.000.000 til	kr.	0
§ 18 verður sett til	kr.	59.187.000

Tá eingin heimuldarlóg er, hvussu hesin peningur kann nýtast, verður hon strikað.

Broytingaruppskotini fullu við ávikavist 10-0, 10-0, 10-0, 12-0 og 9-1 atkvøðum.

Anfinn Kallsberg, løgtingsmaður legði fram soljóðandi

I

U p p s k o t

til
samtyktar

Játtanin á 13018 Nýggir vegir og brýr, breiðkan av brúm, størri ábøtur v.m., verður at nýta til niðanfyristandandi arbeiði:

1.	Vegagerð á Sandi	kr. 0.5 mió.
2.	Vegagerð í Vágum	- 2,0 -
3.	Tórshavn - Kirkjubøur	- 3,0 -
4.	Kollafjørð - Hósvík	- 2,5 -
5.	Oyri - Svínáir	- 1,0 -
6.	Fjarðavegurin	- 2,0 -
7.	Strendur - Skála	- 0,5 -
8.	Klaksvík - Norðoyri	- 2,0 -
9.	Syðradalur - Trøllanes	- 1,5 -
10.	Fugloy	- 0,3 -
11.	Felags/at taka til	- 1,5 -
		kr. 16,8 mió.

II

U p p s k o t

til
samtyktar

Játtanin á 18686 Stuðul til umhvørvisverndartiltøk verður at nýta soleiðis:

Kloakkveiting av Vatnsoyrum	kr. 1,5 mió.
Annað	- 0,5 -
	kr. 2,0 mió.

Atkvøtt varð við navnakalli, uppskotini I og II fullu við 8-2 atkvøðum.

Løgtingsmenninir Vilhelm Johannesen, Niels Pauli Danielsen, Anfinn Kallsberg, Tordur J. Niclasen, Flemming Mikkelsen, Karl Heri Joensen og Johannes Ellefsen løgdu fram soljóðandi

broytingaruppskot

Grein 11 verður sett til	kr. 140.824.000
Grein 12 verður sett til	kr. 357.910.000
Grein 13 verður sett til	kr. 159.250.000

Uppskotið varð samtykt.

3. viðgerð 21. desember 1993. Fíggjarløgtingslógin 1994 soleiðis broytt endaliga samtykt við 19-0 atkvøðum.

Lóg. nr. 202 frá 22. desember 1993.

FL jnr. 2500-11/93.

4 Løgtingslóg um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya

Ár 1993, týsdagin 3. august legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya.

§ 1. Lógin fevnir um:
1) forkanningar við atliti at leiting eftir og útvinning av ráevnum úr undirgrundini, sum ikki á landi ikki hava verið troytt av privatum fyri 23. februar 1932,
2) vísindaligar kanningar av undirgrundini, sum hava týdning fyri tað virksemi, nevnt er undir nr. 1.

Stk. 2 Lógin hevur eisini gildi fyri føroyska havbotnin.

§ 2. Landsstýrið kann geva loyvi til tær kanningar, nevndar eru í § 1.

Stk. 2 Verður ikki stytri tíðarfreist ásett í einum kanningarloyvi, er loyvið galdandi í 3 ár. Í loyvinum skal verða tilskilað, hvørji øki, tað fevnir um.

Stk. 3 Loyvi til forkanningar gevur rættindi til jarðfrøðiligar, jarðalisfrøðiligar, jarðevnafrøðiligar og jarðtøkniligar kanningar. Loyvið gevur ikki rætt til útvinning av ráevnum, heldur ikki forrætt til seinni leitingar- og útvinningarloyvi.

§ 3. Landsstýrið kann áseta treytir fyri einum kanningarloyvi, herundir um rindan av avgjaldi og ágávu, og frágreiðing um gongdina í kanningum og um úrslitini, og um trúnað.

Stk. 2 Landsstýrið kann áseta reglur um avgjøld og um ágávu fyri at veita kanningarloyvi.

Stk. 3 Landsstýrið kann loyva, at kanning-

Forslag

til

lagtingslov om forundersøgelser m.m. af Færøernes undergrund.

§ 1. Loven omfatter:
1) Forundersøgelser med henblik på efterforskning og udvinding af råstoffer i undergrunden, som ikke har været undergivet privatøkomisk udnyttelse her i landet før 23. februar 1932,
2) Videnskabelige undersøgelser af undergrunden af betydning for den under nr. 1 nævnte virksomhed.

Stk. 2 Loven gælder også for færøsk kontinentalsokkelområde.

§ 2. Landsstyret kan give tilladelse til de i § 1 nævnte undersøgelser.

Stk. 2 Medmindre der fastsættes et kortere tidsrum i den enkelte undersøgelsestilladelse gives tilladelsen for 3 år. Tilladelsen skal angive de områder, den omfatter.

Stk. 3 En forundersøgelsestilladelse giver ret til geologiske, geofysiske, geokemiske og geotekniske undersøgelser. Tilladelsen giver ikke ret til udvinding af råstoffer, ej heller fortrinsret til senere udstedelse af en efterforsknings- og udvindingstilladelse.

§ 3. Landsstyret kan fastsætte vilkår for en undersøgelsestilladelse, herunder om betaling af afgift og gebyr og om rapportering af undersøgelsernes forløb og resultater, samt om fortrolighed med hensyn til disse.

Stk. 2 Landsstyret kan fastsætte bestemmelser om afgift og om gebyr for meddelelse af tilladelser.

Stk. 3 Landsstyret kan tillade, at under-

arnar verða gjørdar á annan mans ogn, hóast tað kann hava við sær skaða ella ampa, ið fult endurgjald verður at veita fyri.

§ 4. Tann, ið hevur loyvi sambært hesi lóg, hevur skyldu at endurgjalda skaðar, sum standast av loyvda virkseminum, hóast skaðin stendst av tilvild.
Stk. 2 Hevur tann, ið varð fyri skaða, tilætlað ella av grovum ósketni medvirkað til skaðan, kann endurgjaldið verða lækkað ella burtur.

§ 5. Verða kanningar gjørdar úti á havi, skal skipast soleiðis fyri, at fiskiskapinum verður sýnt neyðugt fyrilit.

§ 6. Landsstýrið kann heimila øðrum landsstovnum at umsita tær heimildir, veittar eru landsstýrinum sambært hesi lóg.

§ 7. Myndugleikar og onnur, sum virka sambært hesi lóg, og annars øll, sum á einhvønn hátt medvirka, hava tagnarskyldu sambært §§ 152 og 264 b í revsilógini viðvíkjandi upplýsingum, stakroyndum o.a.m., sum myndugleikarnir fáa frá loyvishavum.

§ 8. Tann, sum útinnir virksemi, ið er umfatað av hesi lóg, uttan loyvi landsstýrisins, ella sum ikki sendur inn stakroyndir og aðrar upplýsingar, sum álagt er í loyvistreytunum, jbr. § 3 stk. 1 í hesi lóg, verður revsaður við bót ella hefti.
Stk. 2 Verður brotið gjørt av partafelagi, smápartafelagi, lutafelagi ella tílíkum felagum, kann bótin verða kravd av felganum sjálvum.

§ 9. Lógin kemur í gildi dagin eftir at hon er lýst.

undersøgelserne gennemføres på fremmed ejendom, selvom det måtte medføre skade eller ulempe, mod fuld erstatning herfor.

§ 4. En indehaver af en tilladelse efter denne lov skal erstatte skader, der forvoldes ved den i henhold til tilladelsen udøvede virksomhed, selvom skaden er hændelig.
Stk. 2 Har skadelidte ved fortsæt eller grov uagtsomhed medvirket til skaden, kan erstatningen nedsættes eller bortfalde.

§ 5. Undersøgelser, der foregår til havs, skal tilrettelægges med fornøden hensyntagen til fiskeriet.

§ 6. Landsstyret kan bemyndige andre landsinstitutioner til at udøve beføjelser, der ved loven er tillagt landsstyret.

§ 7. Myndigheder og personer, der udøver opgaver efter denne lov, samt enhver der iøvrigt yder bistand hertil, er underkastet tavshedspligt efter bestemmelserne i §§ 152 og 264 b i borgerlig straffelov med hensyn til oplysninger og prøver m.m., som myndighederne modtager fra indehavere af forundersøgelsestilladelser.

§ 8. Med bøde eller hæfte straffes den som udøver virksomhed omfattet af denne lov uden tilladelse fra landsstyret, eller som undlader at indsende prøver og andre oplysninger som påbudt i vilkår for en tilladelse, jfr. lovens § 3, stk. 1.
Stk. 2 For overtrædelser, der begås af aktieselskaber, anpartsselskaber, andelsselskaber, eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar.

§ 9. Loven træder i kraft dagen efter den er bekendtgjort.

Viðmerkingar

Tann 22. desember 1992 skrivaðu løgmaður og forsætismálaráðharrin undir sáttmála millum donsku stjórnina og Føroya Landsstýri um ráevni í undirgrundini.

Sambært hesum sáttmála verður málsøkið "ráevni í undirgrundini" føroyskt sermál við heimild í grein 3 jbr. lista B pkt. 3 í heimastýrislógini.

Sáttmálin er í roynd og veru ein staðfesting av teirri semju, ið kom í lag á fundi í forsætisráðnum tann 11. september 1992 millum Føroya Landsstýri og donsku stjórnina.

Sáttmálin varð góðkendur av Føroya Løgtingi tann 4. mai 1993 sí løgtingsmál nr. 80/1992.

Føroyskir myndugleikar hava við hesi avtalu fingið ræði á einum øki, vit ikki hava stóran kunnleika til. Landsstýrið setti tí í desember 1992 ein bólk av serkønum og embætismonnum at viðgera ymsar spurningar í sambandi við yvirtøkuna av undirgrundini og fáa til vegar grundarlag fyri at gera eina virkisætlan fyri framtíðar olju- og gasskanningum.

Nevndin handaði landsstýrinum álit sítt tann 25. juni 1992, og mælir nevndin m.a. í álitinum til, at nýggj heildarátiggáva verður gjørd innan hetta øki.

Ráevnisvirksemið í undirgrundini kann býtast sundur í:

- Forkanningar og vísindaligar kanningar, ið kunnu hava týdning til tess at meta um møguleikarnar at finna ráevni í undirgrundini,
- miðvísa ráðvøruleiting,
- veruliga útvinning.

Núgaldandi rættarstøða í Føroyum er hendan:
Lóg nr. 181 frá 8. mai 1950 um "efterforskning og indvinding af råstoffer i kongeriget Danmarks undergrund" er sambært grein 11 í lógini galdandi fyri Føroyar "med den begrænsning, som følger af lov nr. 137 af 23. marts 1948 om Færøernes hjemmestyre". Hon varð sett í gildi í Føroyum við tinglesing tann 5. februar 1952. Henda lóg er galdandi fyri undirgrundina, bæði undir landinum og undir havbotninum. Yvirvaldsrættur danska ríkisins yvir havbotninum um Føroyar er lýstur við kongligari fyriskipan nr. 259 frá 7. juni 1963 um "udøvelsen af dansk højhedsret over den kontinentale sokkel", og fyribils útgreind í fráboðan forsætismálaráðsins í Statstidende 7. mai 1985. 1950-lógin heimilar einans myndugleikunum at geva loyvi til kanning og útvinning av ráevnum í undirgrundini fyri eitt tíðarskeið, ið kann vara inntil 50 ár.

Sambært grein 13 í heimastýrislógini verða hesar reglur framhaldandi í gildi í Føroyum í tann mun, tær ikki eru ímóti heimastýrislógini, inntil tær verða broyttar ella avtiknar av røttum myndugleika (heimastýrinum).

Sum nevnt omanfyri sigur nevndin, ið sett varð av landsstýrinum at neyðugt verður við umfatandi nýggjari lóggávu á ráevnisøkinum, og er landsstýrið samt í hesum.

Ráevni, ið kanska liggja fjald í undirgrundini, vita vit einki um, fyrrenn vit hava gjørt

kanningar hesum viðvíkjandi. Tað, ið myndugleikunum fyrst og fremst torvar, er vitan um ráevnini í undirgrundini, og hendan vitan fæst bert við meira ella minni kostnaðarmiklum forkanningum og vísindaligum kanningum.

Verður avgerð tikin um at kanna møguleikarnar fyri útvinning nærri, verður hetta gjørt antin við at myndugleikarnir sjálvir taka stig til leiting eftir ávørum ella - sum vanligari er - við at myndugleikarnir geva privatum fyritøkum forkanningaloyvi. Bendа forkanningarnar á, at nakað er at leita eftir, kann koma upp á tal at geva fyritøkum leitingarloyvi, ofta við útvinningarrætti undir gjøllari ásettum treyum.

Umframt nýggja ráevnislóg kann verða neyðugt við aðrari lóggávu, og at broyta og dagføra galdandi lóggávu.

Ásannandi at fullfíggjað uppskot til tílíka lóggávu verður stórverk, ið fer at taka drúgva tíð, tekur landsstýrið undir við tilmælinum frá nevndini um at byrjað verður við meira avmarkaðari lóggávu, ið bert viðvíkur forkanningum og vísindaligum kanningum, ið kunnu hava týdning fyri møguliga ráevnisútvinning.

Hetta hevur tveir eyðsýndar fyrimunir: Tað, sum er mest átrokandi, er at fáa eina hylling á, hvørt ráevni finnast í føroysku undirgrundini, sum vert kann vera at fara undir at útvinna, og hesa vitan fáa vit bert við at skapa fortreytir fyri, at farast kann undir forkanningar. Galdandi lógin frá 1950 hevur sum nevnt ongar reglur um forkanningar, og hildið verður, at tað ikki er beint at geva einsæris feløgunum loyvi til tílíkar forkanningar, fyrrenn neyðuga lógarverkið við tilhoyrandi umsiting er fingið til vegar.

Vísir tað seg, at áhugi verður fyri at gera tílíkar forkanningar, kann arbeiðast við øllum lógarverkinum tey 2-3 árini, ið haldast má, fara at ganga, áðrenn nakar veruligar og ítøkiligar ábendingar eru fingnar um ráevnismøguleikarnar í føroysku undirgrundini.

Tíðin, ið gongur, meðan hesir møguleikar verða kannaðir, eigur at verða nýtt til at útvega fullfíggjað lóggávuverk, soleiðis sum skotið er upp av nevndini, eins og ein føroysk ráevnisumsiting eigur at verða skipað. Somuleiðis eigur at verða skipað fyri einum almennum orðaskifti um, hvussu hesi møguleikar best kunnu verða troyttir til frama fyri føroyska samfelagið.

Lógaruppskotið um forkanningar er orðað soleiðis, at tað einans viðvíkur hesum virksemi, og verður tí hildið beint, at 1950-lógin framhaldandi verður verandi í gildi, inntil ein nýggj og tíðarhóskandi lóg um ráevnisvirksemi kann verða samtykt.

Løgtingsmenn hava fingið eitt eintak av frágreiðingini frá oljuráðleggingarnevndini og verður í sambandi við lógaruppskotið serliga víst til síðurnar 30 til 44 og 93 til 95.

Málið verður við hesum lagt fyri løgtingið.

1. viðgerð 8. september 1993. Málið verður viðgjørt saman við løgtingsmál nr. 5/1993: Leiting eftir olju og jarðgassi á føroyskum øki og beint í marknaðarnevndina, sum 21. september 1993 legði fram soljóðandi

F e l a g s á l i t

í

løgtingsmáli nr. 4/1993: Løgtingslóg um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya.
løgtingsmáli nr. 5/1993: Leiting eftir olju og jarðgassi á føroyskum øki.

Tingmál nr. 4 er lagt fram av landsstýrinum tann 31. august 1993 og tingmál nr. 5 er lagt fram av landsstýrinum tann 7. september 1993 og vórðu beind í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt bæði málini undir einum og nevndin hevur undir viðgerðini havt fundir við "Oljuráðleggingarnevnd Landsstýrisins" og felagsskapin "Føroya Olju-fdnaður".

Serliga neyvt viðgjørdir eru spurningarnir um seismiskar kanningar saman við jarðfrøðiligu viðurskiftum á sjógvi og landi. Upplýst er, at áhugin fyri seismiskum kanningum uppi á landi ikki higartil hevur havt tann stóra áhugan samanborið við kanningar av havbotninum, og tá serliga fram við markinum hóti bretskum sjógvi.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hergeir Nielsen, Sverre Midjord, Atli P. Dam, Helena Dam á Neystabø, Olaf Olsen og Birgir Danielsen) førir fram: Hildið verður, at rætt er at bera skjótt at í hesum eftir umstøðunum væl lýsta og týdningarmikla máli, tó við avgjørdum fyrivarni mótvegis umhvørvi og livandi tilfeingi, og tá serliga um nøkur vinna spyrst burturúr forkanningunum.

Tað er rætt longu nú at boða frá útetlir, at føroyingar fara undir forkanningar við atliti til eina møguluga ráevnisvinnu, tá neyðugu fortreytirnar eru fingnar til vega.

Her verður hugsað bæði um lógarkarmar, ognarviðurskifti, umhvørvi, vinnulívs - ja, alla samfelagsmenningina sum heild fyri einum framtíðar Føroyum.

Tað er sera umráðandi, at stig longu nú verða tikin til, at føroysk vinnulig áhugamál verða sett í fremstu rað. Bæði í verandi ráevnisvinnu í frammandum sjógvi, og síðan í føroyskum. Tað er umráðandi, at føroyskar vørur, tænastur, handverk, handil, samskifti, havnaløg og manningar eru í fremstu rað longu nú farið verður undir seismiskt kanningarvirksemi. Eisini verður stórur dentur lagdur á at treyta sær, at ungfólk beinanvegin fáa høvi til at koma umborð á kanningarskip fyri at fáa upplæring innan allar tættir innan ráevnisvinnu frá byrjan til enda.

Vísandi m.a. til samsvarandi norsk krøv verður tað eitt náttúrligt krav frá føroyskari síðu, at tey feløg, ið fáa vinnulig rættindi, skulu leggja hesi til rættis soleiðis, at føroyskur ídnaður, verkfrøði og gransking koma í fremstu rað skjótast gjørligt, og soleiðis, at neyðugt grundarlag verður skapt fyri kappingarføri framyvir.

Frásæð føstu arbeiðsmegini verður tað eitt náttúrligt krav, at lóggivið verður frá almennari síðu um ta arbeiðsmegi, ið nýtt verður. Tað verður eitt krav frá føroyskari síðu, at frásæð einum lægstamarki av størvum við serkunnleika skal føroysk arbeiðsmegi takast fram um aðra

í øllum tættum, sum hava við føroyska rácvnisvinnu at gera.

Mælt verður til, at tann almenna fyrisitingin, sum tekur seg upp, fer at virka í neyvum samstarvi við vinnulívið, og at stórur dentur verður lagdur á at fáa ta frægastu serfrøðina, vit varða av, at skipa fyri á hesum øki.

Vísandi til hesar viðmerkingar mælir meirilutin løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Edmund Joensen) tekur í høvudsheitum undir við meirilutanum í, at farið eigur at vera undir skjótast gjørligt at fyrireika kanningar, leiting og útvinning av olju og gassi í føroysku undirgrundini, líkaleiðis at føroysk áhugamál í øllum liðum eiga at koma í fremstu røð í hesum sambandi. Men minnilutin heldur tað vera óráð at fara undir nakrar forkanningar og at geva nakað loyvi, fyrr enn endalig avgerð er fingin á marknatrætuni millum Føroyar og Bretland.

Vert er at hava fyri eyga, at vinna sjónarmiðini hjá bretum frama, so hava føroyingar mist størsta partin av ti økinum, har bestu møguleikarnir í dag sýnast at vera fyri at finna olju og gass.

Okkara ynski um eina rættvísa avgerð standa upp í móti kreftum, sum hava heilt aðrar hugsanir um slík viðurskifti. Tað er lítið í søguni, sum bendir á, at rættvísið altíð vinnur frama. Og hvat er rættvísi. Endar avgerðin av málinum við altjóða dómstólin í Haag, so er eingin vegur aftur, og tann avgerðin kann sammetast við at spæla í happadrátti. Tí mugu øll evni setast inn á at fáa eina samráðingarloysn.

Sambandsflokkurin hevur áður víst á, at tað var skeivt av landsstýrinum at taka formansskapin í nevndini, sum skal samráðast við bretar, úr hondunum á dønum og harvið í roynd og veru sleppa okkum av hondum alla ta vekt, sum danska ríkið hevði at geva nevndini, um danir formliga høvdu staðið fyri leiðsluni. Flokkurin meinar, at samráðingarstøða okkara er munandi viknað av teirri orsøk. Samráðingarnar áttu at verið førdar á hægri politiskum stigi millum stjórnirnar í báðum ríkjunum.

Eingin ivi er um, at fleiri oljufeløg hava alstóran áhuga í at sleppa at útvinna olju eisini úr føroysku undirgrundini skjótast gjørligt, og "skjótast gjørligt" merkir í hesum føri fleiri ár. Tey eru stórt sæð líka glað, um hotnurin er føroyskur, danskur ella bretskur, bara har finst olja.

Drúgvar forkanningar skulu gerast, áður enn farast kann undir leiting eftir olju, tíansheldur at fara undir at útvinna oljuna. Gevur landsstýrið loyvi til forkanningar nú, so er prosessin farin í gongd, og oljufeløgini kunnu so eftir løgdu ætlanini granska úrslitini í frið og náðum, og tey hava als ongan áhuga fyri marknaspurninginum.
Bretar kunnu væl bíða eina rúma tíð eftir tí, sum møguliga er í undirgrundini føroysku megin miðlinjuna. Teir hava nóg mikið sínu megin fyri fyrst. Men spurningurin er, hvussu leingi føroyingar orka at bíða, áðrenn teir verða kroystir at gera nakað desperat, í ringasta føri at beina avgerðina til Haag.

Var rætt atborið, so áttu hesi uppskotini ikki at verið løgd fyri tingið, fyrr enn marknaspurn-

ingurin var endaliga avgjørdur.

Boða føroyingar frá, at eingi loyvi verða givin til forkanningar, fyrr enn trætumálið er loyst, so fara kanningarfeløgini og oljufeløgini at gera sína ávirkan galdandi, tí tey eru altrá eftir at sleppa fram at skjótast møguligt. Henda áhuga teirra eiga vit at nýta til okkara fyrimun til tess at koma fram til eina skjóta loysn á marknatrætuni. Talan verður, ið hvussu so er, ikki um nakran útvinning, fyrr enn marknaspurningurin er loystur, og tess fyrr, hetta verður, tess fyrr kunnu føroyingar fara undir leiting og útvinning.

Út frá hesum viðmerkingum tekur miunilutin ikki undir við uppskotunum hjá landsstýrinum.

2. viðgerð 24. september 1994. Samtykt at beina málið til 3. viðgerð við 17-0 atkvøðum.

3. viðgerð 24. september 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

FL jnr. 140-9/93.

Lóg nr. 179 frá 21. oktober 1993.

5 Leiting eftir olju og jarðgassi á føroyskum øki

Ár 1993, týsdagin 7. september legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

1. Við uppskoti landsstýrisins til løgtingslóg um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya, løgtingsmál nr. 4/1993, er fyrsta stigið tikið til at staðfesta, um olja og gass, sum tað loysir seg at útvinna, finnast í føroysku undirgrundini. Lógaruppskotið er ein náttúrlig fylgja av avtaluni frá 22. desember 1992 millum donsku stjórnina og Føroya landsstýri um yvirtøku av málsøkinum ráevni í undirgrundini sum føroyskt sermál.

2. Løgtingið má ásanna, at undirgrund Føroya, bæði undir landinum og undir havbotninum er lítið kannað, og at kunnleikin um jarðfrøðina er ófullfiggjaður. Stórur tørvur er á forkanningum til tess at leggja tryggt støði undir eina møguliga grundleggjandi avgerð hjá landsstýri og løgtingi um at loyva leitingarvirksemi eftir olju og jarðgassi á økinum, og undir avgerðir hjá oljufeløgunum um at fara undir slíkt virksemi, tá ið fyritreytirnar eru fingnar til vega.

3. Løgtingið ásannar somuleiðis, at viddin á føroyska landgrundsøkinum fyribils er ásett við fraboðan donsku stjórnarinnar frá 7. mai 1985 í Statstidende, og at samráðingar eru við Bretland um endaliga landgrunsmarkið millum Føroya og Bretlands. Í mars í ár varð avtalað við donsku stjórnina, at landsstýrið stendur fyri leiðsluni av hesum samráðingunum.

4. Løgtingið tekur undir við landsstýrinum í, at tað lógarfyrireikandi og útgreinandi arbeiðið, ið byrjaði tíðliga í ár, heldur fram við at gera uppskot til nútíðars undirgrundarlóg og aðra neyðuga lóggávu umframt uppskot til framtíðar treytir fyri leitingar- og útvinningarloyvum. Harafturat eigur greiða at fáast á, hvussu størst møguligt fyrilit kann havast fyri fiskivinnu og umhvørvi, og hvussu arbeiðsmøguleikar, vinnu- og samfelagsáhugamál verða tryggjað á bestan hátt, verður talan um leiting eftir og útvinning av kolvetnum á føroyskum øki.

5. Løgtingið váttar, at sum skjótast eftir, at løgtingslógin um forkanningar o.a.m. er komin í gildi, eiga gjøllari reglur at verða ásettar og stig tikin til at geva áhugaðum seismikkfeløgum og oljufeløgum loyvi til forkanningar. Løgtingið tekur eisini undir við, at tá greiða er fingin á omanfyri nevndu viðurskiftum, helst eftir táum árum, eigur fyrsta føroyska útbjóðingarumfarið at verða fyriskipað við tí í hyggju at geva loyvi til at leita eftir og at útvinna olju og jarðgass. Løgtingið vónar, at hetta fer at vera til gagns fyri landsins búskap og fer at bøta um arbeiðsmøguleikar landsins.

Viðmerkingar

Landsstýrið legði í seinastu viku uppskot fyri løgtingið um løgtingslóg um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya, løgtingsmál nr. 4/1993.

Í tilmælinum í frágreiðingini frá ojurádleggingarnevnini mælir nevndin m.a. til, at landsstýrið saman við hesum lógaruppskoti leggur fyri løgtingið uppskot til samtyktar um, at føroyingar hava í hyggju at lata upp fyri leiting eftir olju og jarðgassi, tá ið fyritreytirnar eru fingnar til vega.

Endamálið við einum slíkum uppskoti til samtyktar er at gera greitt hvønn politikk Føroyar ætla at reka á hesum øki framyvir.

Sostatt leggur landsstýrið fyri løgtingið slíkt uppskot til samtyktar og vil mæla til, at tað verður viðgjørt saman við løgtingsmáli nr. 4/1993: Uppskot til løgtingslóg um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya.

1. viðgerð 8. september 1993. Málið varð viðgjørt saman við løgtingsmáli nr. 4/1993: Løgtingslóg um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya og varð beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin legði 21. september 1994 fram felagsálit.

Sí felagsálit í løgtingsmálum nr. 4/1993 og 5/1993.

6 Avtøka av løgtingslóg um orkuráð og orkugrunn

Ár 1993, týsdagin 14. september legði Signar á Brúnni, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um orkuráð og orkugrunn.	**lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om energiråd og energifond.**
§ 1.	**§ 1.**
Løgtingslóg nr. 48 frá 7. juni 1979 um orkuráð og orkugrunn verður sett úr gildi.	Lagtingslov nr. 48 af 7. juni 1979 om energiråd og energifond ophæves.
§ 2.	**§ 2.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Við heimild í løgtingslóg nr. 48 frá 7. juni 1979 um orkuráð og orkugrunn varð 5-manna ráð skipað, hvørs uppgáva er at ráðgeva politisku myndugleikunum í øllum orkuspurningum.

Kanningarvirksemi orkuráðsins hevur verið fíggjað úr orkugrunninum, til hann í 1991 varð tikin av. Síðani kom bæði rakstur og kanningarvirksemi beinleiðis á fíggjarlógina, og er játtanin fyri 1993 500.000 kr. til kanningarvirksemi og 400.000 kr. til rakstur av orkuráðnum.

Orkuráðið hevur í skrivi til landsstýrið sagt frá, at tað samstarvar við landsverkfrøðingsstovnin um vatnmátingar, við Náttúruvísindadeildina á Fróðskaparsetrinum um vindmátingar og við Fiskirannsóknarstovuna um oljunýtslu umborð á skipum. Tí heldur landsstýrið, at ráðgevingin og kanningaruppgávurnar eins væl kunnu gerast á hesum stovnum og sjálv málsviðgerðin fara fram í landsstýrinum á Deildini fyri Fiski- og aðrari vinnu.

Fyri at fáa meira burtur úr minni verður mælt til, at Orkuráðið verður tikið av og nýtt rakstrarstað verður gjørt á løgtingsfíggjarlógini, ið verður kallað "Orkumál - umsiting og kanningar". Hetta hevur við sær, at útreiðslurnar til orkumál lækka 200.000 kr. á fíggjarløgtingslóginni fyri 1994.

1. viðgerð 21. september 1993. Málið varð beint í ídnaðarnevndina, sum 21. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 15. september 1993 og eftir 1. viðgerð tann 21. september 1993 beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við umboð fyri Orkuráðið, sum greiddi nevndini frá virksemi ráðsins og m.a. upplýsti, at Orkuráðið í arbeiði sínum hevur savnað saman nógv tilfar um orkuspurningar og at partur av hesum tilfari er fingin til vega í trúnaði.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Jacob Lindenskov, Karl Heri Joensen og Flemming Mikkelsen) vísir á, at landsstýrið í viðmerkingum til uppskotið sigur, at málsviðgerðin av ráðgeving og kanningaruppgávunum kann fara fram í landsstýrinum á Deildini fyri Fiski- og aðrari vinnu. Á fíggjarløgtingslóginni fyri 1994 er játtanin undir grein 18, konto 18653 "Orkuráðið" kr. 0. Í uppskoti landsstýrisins til broytingar á fíggjarlógini 1994, sum varð lagt fram sum fylgiskjal í løgtingsmáli nr. 3/1993: Fíggjarløgtingslóg 1994, verður sagt í viðmerkingunum um Orkuráðið, at stovnurin verður lagdur undir landsverkfrøðingin.

Meirilutin mælir til, at framhaldandi orkuráðgeving verður løgd undir landsverkfrøðingin, uttan hetta tó førir við sær øking av starvsfólkum. Meirilutin tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) tekur ikki undir við málinum.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Samtykt at beina málið til 3. viðgerð við 26-0 atkvøðum.

3. viðgerð 27. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 20-0 atkvøðum.

FL jnr. 1258-2/90.

Lóg nr. 71 frá 10. mai 1994.

7 Broyting í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka

Ár 1993, týsdagin 14. september løgdu løgtingsmenninir Jacob Lindenskov, Olaf Olsen, Jógvan Ingvard Olsen, Heini O. Heinesen, Niels Pauli Danielsen og Tordur J. Niclasen fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka.

§ 1.
Í § 19 verður sett aftan á orðið "rúsdrekka": "ella spjaðing í Føroyum av reklamu, sum umrøða tílíkar vørur".

§ 2.
Henda lóg fær gildi dagin eftir kunngerð.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om indførsel og salg af berusende drikke.

§ 1.
I § 19 indsættes efter ordene "berusende drikke": "eller distribuering af reklame, der omtaler sådanne varer".

§ 2.
Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar

Í lógini um rúsdrekka er øll reklama forboðin sambært § 19.

Hóast so er, verður dúgliga rætt um - reklamerað - um bíligt keyp av tílíkum vørum, sum er ikki loyvt at selja í fríum handli í Føroyum. Víst verður til spjaðing av reklamu um tílíkar vørur frá FAVØR-fyritøkuni í Føroyum.

Men henda mannagongd stríðir móti andanum í lóg um rúsdrekka, sum samtykt er av løgtinginum í 1991.

Landfútin vil tó ikki steðga hesi mannagongd, men vísir harafturímóti til, at kærast kann til løgregluovasta ríkisins í Keypmannahavn.

Eingin ivi átti tó at verið um, hvat nýggja føroyska lóggávan um innflutning og sølu av rúsdrekka sipar til við § 19 í lógini, sum setir bann móti reklamu fyri rúsløgi.

Tá er eisini forboð ætlað móti reklamu, sum tílík reklama má roknast at vera, sum undirgrevur ta rúsdrekkaskipanina, sum løgtingið hevur samtykt, skal verða í Føroyum. Tílíkt eigur sjálvsagt at steðgast, um føroysk lóg á hesum øki skal uppihaldast.

1. viðgerð 21. september 1994. Málið varð beint í rættarnevndina. Burturdottið vegna samgonguslit.

8 Forðan fyri monopolisering av høvuðsvinnuni

Ár 1993, týsdagin 14. september legði Olaf Olsen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

U p p s k o t
til

løgtingslóg um forðan fyri monopolisering av høvuðsvinnuni.

§ 1. Eitt alment ella privat felag kann onganúð eiga meir enn 49% av fiskiídnaðinum í Føroyum, mátað eftir framleiðsluni.

lagtingslov om forebyggelse af monopolisering af hovederhvervet.

§ 1. Et offentligt eller privat selskab kan aldrig eje mer end 49% af fiskeindustrien på Færøerne, målt i forhold til produktionen.

§ 2. Eitt alment ella privat felag kann ongantíð eiga meir enn 49% av fiskiflotanum undir Føroyum, málað eftir veiðini.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

§ 2. Et offentligt eller privat selskab kan aldrig eje mer end 49% af fiskefláden under Færøerne, målt i forhold til fangsten.

§ 3. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er kundgjort.

Viðmerkingar:

Undir umrøðuni av røðu løgmans og fíggjarløgtingslógini er komið fram, at størsti parturin av løgtinginum er í móti, at sokallaða sanceringin av flakavirkjunum verður framd á tann hátt, sum fíggingarstovnarnir nú hava ætlanir um, nevniliga at leggja allan fiskiídnaðin inn í eitt felag, sum fíggjarstovnarnir eiga meirilutan í og harvið hava allan avgerðarrættin.

Mett verður, at hetta fer at hava so skaðiliga ávirkan á menningina innan fiskavirking í Føroyum, tí tað fer at køva alt initiativ frá aðrari síðu, serstakliga nú høvuðsbankarnir verða lagdir saman.

Tí verður uppskot sett fram um at avmarka møguleikan til at leggja alla høvuðsvinnuna saman í eitt alment ella privat felag.

Í. viðgerð 21. september 1993. Málið varð beint í rættarnevndina. Burturdottið vegna samgonguslit.

9 Tilráðing um búskaparliga nevnd

Ár 1993, týsdagin 14. september legði Olaf Olsen, løgtingsmaður, vegna Lassa Klein, løgtingsmann og seg sjálvan fram soljóðandi

Viðmerkingar:
Í Førnyum í dag er búskaparliga støðan - arbeiði, lønsemi, skuld, gjaldføri, íløgur o.a. - so út av lagi, at cingin tingmaður úr nøkrum flokki sær nakra vanliga møguliga loysn burtur úr trupulleikunum. Tað er stórur vandi fyri, at umframt tey fleiri túsund, sum eru vorðin arbeiðsleys, verða helst onnur túsundir, sum flyta burtur í onnur lond fyri at vita, um har eru frægari møguleikar at lívbjarga sær.

Hóast støðan er so vánalig, kann løgtingið ikki seta seg hendur í favn at bíða, til seinasta restin av sjálvræði verður tikin frá okkum.

Tí eigur ein bólkur av tingmonnum, umboðandi allar flokkar á tingi, at verða settur til at koma við uppskotum um, hvussu skipast kann fyri at samfelagið ikki heldur sína leið fram móti ruðuleika.

Út frá hesum verður sett fram soljóðandi

U p p s k o t

til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at seta ein bólk umboðandi allar flokkar á tingi til at koma við tilráðingum um, hvussu tann negativa gongdin í samfelagnum kann steðgast og vendast.

Bólkurin skal koma við áliti aftur til løgtingið, áðrenn samráðingar verða millum landsstýrið og ríkisstjórnina.

Hugsast skal fyrst og fremst um:

1. Hvussu meir arbeiði kann útvegast.
2. Hvussu lønsemið kann betrast.
3. Hvussu almenna skuldin kann skipast.
4. Hvussu gjaldføri kann útvegast.
5. Hvussu íløgur kunnu fremjast.

1. viðgerð 21. september. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 3. november 1993 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av Olaf Olsen, løgtingsmanni, tann 14. september 1993 og eftir 1. viðgerð 21. september 1993 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Helena Dam á Neystabø, Birgir Danielsen og Mikkjal Sørensen) førir fram:

Ásannandi ta óvanligu truplu búskaparstøðu í Føroyum, sum hevur fingið álvarsligar avleiðingar fyri Føroya fólk, og sum hevur birt uppundir, at sjálvt løgmaður alment hevur sagt, at landið er í undantaksstøðu, kann meirlutin taka undir við, at ein bólkur av tingmonnum verður settur við umboðum frá øllum politiskum flokkum á tingi at gera álit til løgtingið um gongdar leiðir burtur úr kreppuni. At meirilutin kann taka undir við hesum uppskoti skal skiljast sum ein roynd at skapa ein karm, ið fær allar flokkar á tingi at arbeiða saman undir ábyrgd á ein hátt, sum vónandi kann leggja aftur at tí arbeiði, sum bæði landsstýri og samgonga ger til tess at basa trupulleikunum. Støðan er so álvarsom, at brúk er fyri, at allir flokkar arbeiða saman um m.a. spurningar, sum eru nevndir í uppskotinum

til samtyktar.

Meirilutin metir, at tað hevur týdning, at ein tílík nevnd fær heimild at útvega sær serkøna hjálp og fær møguleika fyri at fáa ein skrivara. Heitt verður á formansskapin í løgtinginum og á løgtingsskrivstovuni at bera so í bandi, at búskaparliga nevndin fær hesar heimildir.

Í uppskotinum til samtyktar er ávís tíðarfreist ásett. Meirilutin metir ikki, at henda tíðarfreist kann haldast, og broytir tí uppskotið soleiðis, at tíðarfreistin at lata álit úr hendum verður longd til 15. januar 1994.

Meirilutin setir sostatt fram soljóðandi

U p p s k o t

til samtyktar

Løgtingið samtykkir at seta ein hólk umboðandi allar flokkar á tingi til at koma við tilráðingum um, hvussu negativa gongdin í samfelagnum kann steðgast og vendast.

Bólkurin skal koma við áliti aftur til løgtingið áðrenn 15. januar 1994.

Ein minniluti (Lisbeth L. Petersen) setir einki uppskot fram.

Ein annar minniluti (Hans Tausen Olsen) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 16. november 1993. Atkvøðugreiðslan varð útsett til næsta fund. Næsti fundur 23. november 1993. Upprunauppskotið fall við 11-0 atkvøðum. Uppskot meirilutans fall somuleiðis við 11-0 atkvøðum.

10 Broytingar í rentulógini

Ár 1993, týsdagin 19. oktober legði løgmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Eftir § 8 í lóg nr. 618 frá 19. desember 1984 um broyting í lóg "om renter ved forsinket betaling, forsikringsaftaleloven m.v." verða §§ 1 og 3 í hesi lóg at seta í gildi fyri Føroyar.

Viðmerkingar

Sorinskrivarin hevur í skrivi, dagfest 16. januar 1990 heitt á landsstýrið um at fáa rentulógina broytta soleiðis, at morarentan verður hækkað.

Í løtuni er morarentan tann sama sum diskontoin ella 9,25%.

Frá tí, at løgtingið í 1981 avgjørdi, at rentan í Føroyum fyri ov seina gjalding ikki skuldi verða tann sama sum í Danmark, nevniliga diskontoin + 2%, men hert diskontoin og við teirri grundgeving, at útlánsrentan í Føroyum tá var nakað lægri enn í Danmark, er hent tað, at diskontoin nú er munandi lægri enn útlánsrentan í Føroyum.

Í Danmark er komið fram til, at upprunaliga rentan, ið ásett varð í rentulógini ikki veitti kredittveitaranum fulnað fyri útreiðslurnar, og varð morarentan tí í 1984 hækkað til diskontoina + 6%.

At morarentan er so lág hevur ført við sær, at tað sýnist sum skuldarar nýta rentufyrimunin til ikki at rinda sína skuld, sum kredittgrundarlag, í staðin fyri at hava t.d. ein kassakreditt. Hetta hevur ført við sær, at borgarligu málini við Føroya rætt eru ógvuliga nógv í tali. Í 1989 vóru tey umleið 6.500, sum er meira enn dupult so nógv sum í einum tilsvarandi rættardømi í Danmark.

Sorinskrivarin metir eisini, at tað er óheppið, at rættarsind ikki er á hesum øki, tá tað í nógvum førum er ivasamt, um føroysk ella donsk rentulóggáva skal nýtast.

Í Grønlandi er lógin frá 1984 um hækking av morarentuni sett í gildi.

Hjálagda lógaruppskot broytir 6 ymiskar lógir, men viðvíkja bert 3 av teimum ikki yvirtikin málsøkir, nevniliga lóg nr. 638 frá 21. desember 1977 "om renter ved forsinket betaling m.v.", lóg nr. 129 frá 15. apríl 1930 "om forsikringsaftaler" og lóg nr. 275 frá 9. juni 1982 "om køb på kredit". Tó verður einans skotið upp at seta § 1 og § 3 í gildi, tá ein nevnd situr og arbeiðir við broytingum í tryggingarlóggávuni, og er ætlanin at hava broytingina í § 2 við har.

Í lógini er eisini ásett, at løgmálaráðharrin annaðhvørt ár aftaná samráðing við danska tjóðbankan og búskaparmálaráðið kann broyta reńtuna. Hetta merkir, at rentubroyting í framtíðini kann ásetast við kunngerð.

Uppskotið hevur verið lagt fram sum løgtingsmál nr. 93/1989, men var ikki avgreitt, tá tingið fór heim, og sostatt burturdottið.

Eisini varð málið lagt fram sum løgtingsmál nr. 39/1990, og samtykti løgtingið tann 24. apríl 1991, at rættarnevndin sum millumtinganevnd skuldi arbeiða viðari við málinum og leggja fram álit í Ólavsøkutingsetuni.

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja, at setast kann í gildi fyri Føroyar § 1 og § 3 í lóg um broyting í lóg "om renter ved forsinket betaling, forsikringsaftaleloven m.v."

1. viðgerð 27. oktober 1993. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. november 1993 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 19. oktober 1993 og eftir 1. viðgerð 27. oktober 1993 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og tekur **ein samd nevnd** undir við uppskoti landsstýrisins og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 25. november 1993. Uppskotið endaliga samtykt við 22-1 atkvøðum.

11 Landsstýrismál

Ikki framlagt.

12 Dómarakanning t.e. óheft kanning av politisku og umsitingarligu ábyrgdini í áttatiárunum

Ár 1993, týsdagin 19. oktober legði Niels Pauli Danielsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Føroya Løgting samtykkir, at óheft kanning skjótast gjørligt verður sett í verk eftir § 21 í rættargangslógini til tess at staðfesta, um politiskt og umsitingarligt ábyrgdarloysi er farið fram í Føroyum í áttatiárunum.

Viðmerkingar

Stórir spurningar hava verið settir við tað politiska og umsitingarliga valdið í Føroyum. Serliga áttatiárini hava verið drigin fram.

Grefligasta dømið var, tá ið avtøkustjóramir á Skála Skipasmiðju hin 25. januar 1990 komu við soljóðandi tilmæli:

"Aftan á at hava gjøgnumgingið málið, vísandi til omanfyristandandi, meta vit, at fleiri viðurskifti eru í hesum byggimáli, sum eftir okkara sykki eru óvanlig, og antin má talan vera um viðurskifti, sum kunnu hava revsing við sær, ella er talan um politisk: og umsitingarligt ábyrgdarloysi, og verður tí mælt til, at landsstýrið umhugsar at leggja málið fyri politivaldið til kanningar."

Undirstrikingin er gjørd av undirritaða. Avtøkustjóramir vóru hesir 4 løgfrøðingarnir: Jógvan Páll Lassen, Jalgrím Hilduberg, Bjørn á Heygum og Poul Hansen.

Landsstýrið koyrdi málið til fútan, sum reisti ákæru móti fyrrv. stjórum á Skála Skipasmiðju, byggiharranum og ráðgeva hansara.

Føroya Rættur fríkendi allar fyri allar ákærurnar. Tað sama gjørdi Eystari Landsrættur hin 6. oktober 1993.

Eftir stendur so bin møguleikin, sum avtøkustjórarnir vístu á, politiskt og umsitingarligt ábyrgdarloysi, ið Føroya Løgting má haldast hava beinleiðis skyldu til at fara undir at kanna, serliga tá ið havt verður í huga, at ein av avtøkustjórunum er skrivstovustjórin í landsstýrinum.

Støðan, ið landið alt er komið útí, sum fær familjur í stórum tali at missa hús og heim og flyta av landinum, krevur eisini eina kanning, sum eigur at verða sett í verk beinanvegin.

1. viðgerð 16. november 1993. Málið varð beint í rættarnevndina. Burturdottið vegna samgonguslit.

13 Val av álitismonnum og nevndum

Ikki viðgjørt.

14 Broyting í útvarpsgjaldsskipanini

Ár 1993, týsdagin 19. oktober Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at gera neyðugar broytingar í lógini um útvarp soleiðis, at bert eitt útvarpsgjald verður at rinda fyri hvørt húski.

Viðmerkingar:

Lógin um útvarp heimilar at krevja og panta eftir hvørjum einasta radiotóli í landinum, og ikki munnu tey vera so fá, sum soleiðis eru rykt eftir lurtaragjaldi.

Hvussu nógv lurtaratól eru í landinum, er helst torført at vita, men eingin ivi man vera um, at fleiri av hesum ongantíð eru skráseti og sostatt helst heldur ongantíð kravd eftir gjaldi. Hin vegin er tað mangt eitt húski, sum fær krav upp á bæði tvey og trý radiotól.

Í hesum døgum rakar henda skipan mangt eitt húski meint, og verður tí skotið upp, at broyta skipan soleiðis, at lurtaragjaldið hjá øllum húskjum í landinum bert fevnir um tað eina tólið, og ikki sum nú fleiri - íroknað tað í bili og báti.

Ikki verður mett rimiligt, at húski gjalda fyri tól í bili og báti, tá hugsað verður um ta avmarkaðu tíð hjá tilest øllum at lurta í nevndu flutningsførum.

Heldur ikki kann tað vera rætt, at fólk, ið eru noydd at hava bil í sambandi við arbeiði, skuiu gjalda eyka, um lurtitól er í bilinum.

Givið er, at stovnurin við hesum kemur at hava nakað minni av inntøku, og verður hann tí noyddur at tillaga sítt virksemi til fíggjarligu gongdina í samfelagnum eins og aðrir almennir stovnar, ið eru beinleiðis á fíggjarlógini.

Undirritaði hevur áður havt tílíkt uppskot og somuleiðis hava løgtingsgrannskoðararnir í uppskoti gjørt vart við hesi viðurskifti.

Ásannað verður, at vinnur uppskotið frama, vil tað kennast sum lætti hjá mongum, sum í dagliga húsarhaldinum hava sera trupult við at fáa endarnar at røkka.

1. viðgerð 3. november 1993. Málið varð beint í mentanar- og skúlanevndina, sum 6. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, tann 19. oktober 1993 og eftir 1. viðgerð 3. november 1993 beint í mentanar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og havt fund við Jógvan Jespersen, stjóra fyri Útvarp Føroya. Upplýst varð, at skrásettir eru 7.600 bilar, og verður hetta gjald strikað, er talan um ein munandi inntøkumiss. Eins og aðrir landsstovnar má Útvarp Føroya húsast við minkandi inntøkum, og í fyriliggjandi uppskoti til samtyktar er ikki víst á, á hvørjum øki stovnurin skal veita minni tænastu. Hetta er stutt sagt tað, ið hendir, sum uppskotsstillarin fær sín vilja.

Upplýst varð, at um inntøkan lækkar, kemur hetta helst at ganga út yvir millumbylgjusendaran, ella við øðrum orðum, at tað kemur at ganga út yvir føroyska sjómannin, um uppskotið skal fremjast í verki.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hergeir Nielsen, Jógvan A. Johannessen, Helena Dam á Neystabø og Terje Davidsen) vísir á fíggjarnevndarálitið í løgtingsmáli nr. 194/1992, har samtykt varð, at arbeiðast skuldi víðari við spurninginum um lækkan av útvarps-, sjónvarps- og telefonfelagagjaldi fyri at fáa eina hylling á, hvørjar tær fíggjarligu avleiðingarnar fóru at verða, at uppskotið frá løgtingsgrannskoðarunum nr. 194/1992 varð samtykt. Meirilutin heldur tí, at uppskotið frá Tordi J. Niclasen er óneyðugt í og við, at tað longu frammanundan liggur í nevnd og sostatt er undir viðgerð. Meirilutin tekur tí ikki undir við fyriliggjandi uppskoti.

Minnilutin (Óli Breckmann) vísir á síni egnu og fólkaflokksins uppskot higartil um bert eittans útvarpsgjald upp á húskið, tí sum kunnugt ber ikki til at lurta eftir fleiri radiotólum í senn, og eisini á tilmæli frá løgtingsgrannskoðarunum um bert at áleggja hvørjum húski eitt lurtaragjald, og mælir tinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 12. apríl 1994. Málið fall við 9-0.

15 Løgtingslóg um lántøku til landskassan

Ár 1993, týsdagin 19. oktober legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

<u>løgtingslóg um lántøku til landskassan</u>.	<u>lagtingslov om låntagning til landskassen</u>.
<u>§ 1.</u> Landsstýrinum verður landskassans vegna heimilað at læna 1.530.000.000 kr.	<u>§ 1.</u> Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at låne 1.530.000.000 kr.
<u>§ 2.</u> Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.	<u>§ 2.</u> Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Landsstýrið sækir við hesum uppskoti løgtingið um heimild til landskassans vegna at læna 1.530.000.000 kr..

Í avtaluni frá 12. oktober 1993 millum Ríkisstjórn Danmarkar og Føroya Landsstýri hevur danska ríkisstjórnin givið tilsøgn um at veita landskassanum eitt lán uppá 1.400.000.000 kr..

Tað er 1.300.000.000 kr. til bankarnar til nýggjan ábyrgdarpening gjøgnum Píggingargrunnin, sum bæði kann verða partapeningur og lán við ábyrgd, og rentuna av hesum láni tað fyrsta árið, sum landsbankin samtørs tíggjarlógaruppskotinum hevur mett til 100.000.000 kr.

Herumframt verður heimilað landskassanum at læna 130.000.000 kr. at tíggja hallið á tíggjarlógini og til gjaldføri landskassans. Hetta lán skal landskassin taka í Føroyum ella í Danmark.

Umframt omanfyri nevndu lán, sum krevja nýggja lógarheimild til lántøku, fevnir avtalan við donsku stjórnina eisini um ríkislán til landskassan, har lántøkuheimild er. Hesi statslán verða uppá tilsamans 1.740.000.000 kr., og fevna um endurfígging av stuttfreistaðum ríkisláni (1.000.000.000 kr.), uttanlandslánum (við kursbroytingum upp til 640.000.000 kr.) og veksilskuld til Danmarks Nationalbank (100.000.000 kr.).

Í viðgerð 26. oktober 1993. Málið varð viðgjørt saman við løgtingsmáli nr. 16/1993: Avtala millum donsku stjórnina og Føroya Landsstýri um endurfígging og kapitalinnskot í bankarnar v.m. og varð beint í tíggjarnevndina, sum 3. november 1993 legði fram soljóðandi

F e l a g s á l j t

í

løgtingsmáli nr. 15/1993: Løgtingslóg um lántøku til landskassan og nr. 16/1993: Avtala millum donsku stjórnina og Føroya landsstýri um endurfígging og kapitalinnskot í bankarnar v.m.

Málini eru løgd fram av landsstýrinum tann 19. oktober 1993 og eftir 1. viðgerð 26. oktober 1993 beind í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málini og hevur undir viðgerðini hildið fund við Jørn Astrup Hansen, stjóra í P/F Sjóvinnubankanum, og Tage Benjaminsen, stjóra í Føroya Banka. Somuleiðis hevur nevndin hildið fund við Maritu Petersen, løgmann, og Finnboga Ísakson, landsstýrismann í fíggjarmálum.

Á fundunum við bankastjórarnar var støðan í dag, gongdin tað seinasta árið og framtíðarútlitini hjá teimum báðum stóru bankunum, nú aftan á at bankarnir gjøgnum Fíggingargrunnin frá 1992 eftir einum ári hava fingið eitt samlað alment innskot upp á 2.7 milliardir krónur, viðgjørd.

Bankastjórarnir greiddu frá, at bankarnir lúka krøvini um solvens, at avsetingarnar eftir teirra meting nú eru realistiskar, og at gjaldførið hjá bankunum verður rímuligt, men gjørdu vart við, at tað skortar við lønsemi í teimum verkætlanum, sum bankarnir fáa at viðgera.

Víðari greiddu bankastjórarnir frá, at tað í ávísan mun verður neyðugt hjá bankunum at finda skuld uttanlands, og vísandi til, at talið á verkætlanum, ið eru lønandi, er rættiliga avmarkað, verða bankarnir helst noyddir at binda nakað av gjaldførinum í donskum virðisbrøvum. Annar bankastjórin legði dent á, at bankarnir síggja tað sum sín málsetning at vera við til at menna samfelagið.

Á fundinum við Maritu Petersen, løgmann, og Finnboga Ísakson, landsstýrismann í fíggjarmálum, vórðu avtalan, protokollatið og sjálvar samráðingarnar, bæði tær á embætisstigi og tær politisku samráðingarnar 12. oktober 1993, umrøddar. Løgmaður legði dent á, at talan ikki er um nakrar loyniligar avtalur av nøkrum slag.

Nevndin ynskti at fáa aktstykkini, sum vórðu løgd fram undan samráðingunum 12. oktober, frá ávikavist danskari og føroyskari síðu. Talan er um skriv frá Føroya landsstýri til danska fíggjarmálaráðharran, dagfest 21. september 1993, svar frá danska fíggjarmálaráðharranum, dagfest 8. oktober 1993, og danska uppskotið til ta avtalu, sum varð gjørd 12. oktober 1993. Hesi skjøl hava fíggjarnevndarlimirnir fingið undir nevndarviðgerðini.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og triggjar minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Jóhannes Ellefsen, Jens Nordberg og Karl Heri Joensen) **mælir løgtinginum til at samtykkja avtaluna millum donsku stjórnina og Føroya landsstýri um endurfígging og kapitalinnskot í bankarnar v.m.** Somuleiðis mælir meirilutin løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins um lánsheimild til landskassan.

Meirilutin vísir á, at um henda avtalan og henda lántøkan ikki verða samtykt, eru tær avtalur og tær lántøkur, sum gjørdar eru undir samráðingunum tann 6. oktober 1992, tann 1. februar 1993 og tann 28. mai 1993 gjørdar til fánýtis. Tá hava vit eitans skuldarbundið føroyska samfelagið uttan at fáa nakað ítøkiligt burtur úr. Hetta heldur meirilutin vera ábyrgdarleyst.

Meirilutin vísir á, at føroyska bankaskipanin, eins og bankaskipanir í okkara grannalondum og fleiri øðrum londum við, hevur verið í eini álvarsligari kreppu. Orsakað av bankakreppuni hevur alt okkara peningakervi verið í vanda. Men áður gjørdar avtalur við donsku stjórnina og áður tikin lán úr danska ríkiskassanum hava bjargað bankaskipanini og harvið peningakervinum undan einum skrædli, sum hevði verið til óbótaligan skaða fyri føroyska vinnulívið og føroyska samfelagið sum heild.

Meirilutin leggur herðslu á, at bankarnir aftan á hetta peningainnskotið aftur fara at virka sum bankar soleiðis, at vinnulívið og harvið samfelagið sum heild aftur verða fyri menning við tí úrsliti, at framleiðslan og útflutningurin verða økt, og at nógv fleiri hendur koma aftur í vinnu. Treytin fyri hesum er, at tað almenna, bankarnir og vinnulívið taka saman hendur við tí fyri eyga at basa samfelagskreppuni.

Ein avgjørd og beinleiðis treyt fyri, at hetta skal eydnast er, at tey feløg og virkir, ið standa uttanfyri móðurfelagið, Føroya Fiskavirking, fáa somu sømdir frá bankunum, sum tær fyritøkur, ið standa innanfyri móðurfelagið. Lønsemið í eini verkætlan má vera avgerandi fyri, um fígging verður veitt ella ikki. Hetta leggur meirilutin stóran dent á.

Meirilutin ásannar, at fleiri av teimum treytum, sum eru niðurfeldar í avtaluna frá 12. oktober, eru rættiliga harðar. Men hinvegin ásannar meirilutin eisini, at soleiðis sum støðan í føroyska samfelagnum er, høvdu vit ikki sloppið undan slíkum tiltøkum uttan mun til, um hesi vóru niðurfeld í avtaluna ella ikki.

Annars ger meirilutin vart við og undirstrikar, at bygnaðarbroytingarnar á heilsuøkinum, ið verða umrøddar undir punkt a í avtaluni, ikki verða gjørdar við støði í álitinum frá "Rådgivningsgruppen vedrørende sundhedsvæsenet på Færøerne", soleiðis sum skotið varð upp í danska uppskotinum til avtalu.

Eisini í øðrum pørtum av avtaluni - eitt nú viðvíkjandi kommunusamanlegging - er ítøkiligur munur á danska uppskotinum til avtalu og tí endaligu avtaluna, sum varð gjørd á fundinum millum landsstýrið og stjórnina 12. oktober 1993. Meirilutin ger vart við og undirstrikar, at avtalan og ikki uppskotið til avtalu er galdandi, og at uppskotið heldur ikki eigur at nýtast sum tulkingargrundarlag.

Ein minniluti (Flemming Mikkelsen) førir fram:

6. oktober í fjør fingu vit av álvara at kenna, hvørjar avleiðingar, førdi búskaparligi og fíggjarligi politikkurin í 80'unum hevði við sær.

Allar ávaringar vórðu skúgvaðar til viks.

Politiski meirilutin á løgtingi tóktist ikki taka ávaringarnar í álvara og gjørdu tað heldur ikki.

So seint sum í valárinum 1988 varð gjarað út við milliardum, áðrenn løgtingið fór heim.

Tað var ikki lukkuligt at muna ímóti. Tann, ið gjørdi tað, var skírdur afturhaldsfólk at vera, svartasta samband, fylgdi ikki við tíðini, samfelagsskaðiligur o.s.fr.

Sum sagt 6. oktober 1992 fingu vit stólin settan fyri hurðina, nú var ballið lokið, nú skuldi rokningin gjaldast.

Ein av bankunum var við at fara á húsagang, landskassin var í svárari likviditetskreppu.

Eftir avtaluni frá 6. oktober 1992 veitti stjórnin landskassanum trygd fyri einum láni upp á kr. 500 mió., har tær 200 til landskassan og hinar 300 til nýggjan eginpening í Sjóvinnubankanum.

Sagt varð frá politisku leiðsluni, at nú var vunnið á trupulleikunum, nú vóru vit peningaliga so væl fyri sum ongantíð fyrr, eisini varð boðað frá, at tey stig, ið tá vóru tikin, vóru tey einastu røttu, um ikki, so fór alt á húsagang, so høvdu vit tað stóra búskaparliga skrædlið.

Sambandsflokkurin var sum vant hildin uttanfyri allar samráðingar og alla ávirkan, vísti ábyrgd, tók frágreiðingarnar í álvara og atkvøddi fyri avtaluni.

1. februar 1993 var aftur galið, nú vóru kr. 350 mió. læntar og settar í Sjóvinnubankan sum nýggjur eginpeningur.

Longu 28. mai 1993 er uppaftur verri statt, nú veitir ríkisstjórnin landskassanum trygd fyri einum láni upp á 1 milliard krónur.

Tær 560 mió.kr. til bankarnar, tí nú er Føroya Banki komin við, og restin, tær 440 mió.kr., skuldi hin botnleysi landskassin hava.

Haraftrat er tilsøgn givin um endurfígging av uttanlandsskuld landskassans, so hvørt lánini falla til gjaldingar.

12. oktober 1993 verður enn ein avtala gjørd, har bankarnir báðir, við vælsignilsi frá ríkisstjórnini, fáa 1,3 milliardir krónur og landskassin 230 mió.kr.

Kravið um javnvág á figgjarlógini fyri komandi ár er slept, í staðin verður sagt, at hallið á eini komandi figgjarlóg, sum fyribils er mett at verða 300 mió.kr. verður ikki fíggjað við ríkisveðhaldi.

Sum tað framgongur, gerst støðan alsamt hættisligari fyri hvønn dagin.

Sum vant varð sambandsflokkurin leysliga kunnaður um avtalurnar, tá undirskrivað varð. Vit kenna ikki tær internu avtalur, sum náttúrliga er partur av heildini, vit hava onga vissu fyri, at støðan ikki endurtekur seg um stutta tíð, tvørturímóti.

Kostnaðarmiklu bjargingarroyndirnar av føroysku bankaskipanini og føroyska samfelagnum eru eftir øllum at døma fullkomiliga miseydnaðar.

Tað ber alt ikki til at halda fram við at læna seg burtur úr kreppuni.

Nevnast kann, at um hesi uppskot verða samtykt, og alt annað líka, so hava vit eina rentuútreiðslu á figgjarlógini fyri 1995, sum svarar til 2 ára rakstur av føroyska sjúkrahúsverkinum á núverandi støði.

Okkurt brotið í avtaluni tykist vera skilagott og kundi tí verið tikið undir við, men tá avtalan og fyri alt tað lánsheimildin við, má síggjast sum ein liðugt seymað eind, sær minnilutin seg ikki føran fyri at taka undir við málinum.

Sambandsflokkurin dugir ikki at síggja nakað endamál við hesum vaksandi milliarda innskotunum, tað tykist sum um menn hava mist tamarhaldið á støðuni.

Førdi politikkurin ber ikki brá av tí politikki, sambandsflokkurin stendur fyri.

Vit mugu fáa kostnaðarstøðið í eina legu, sum er til at liva við, vit mugu fáa eina handilsavtalu við EF soleiðis, at tað ber til at virka og framleiða úr triðjalandsrávøru, vit mugu leggja alla orku í at menna okkara egnu fiskastovnar.

Hesar eru nakrar av fortreytunum fyri at fáa fleiri hendur í arbeiði.

Men so eiðasørt, hugflogið hjá sitandi og undanfarna landsstýri rakk og røkkur ikki longur enn til sparibússurnar hjá smáspararunum við tí úrsliti, at arbeiðsloysið økist, flytingin av landinum økist, máttloysið er við at leggja sína køldu hond á alt fyritakssemi.

Ein annar minniluti (Anfinn Kallsberg) førir fram:

Vísandi til álit okkara í løgtingsmáli nr. 204/1992: Lántøka til landskassan og 207/1992: Rammuavtala frá 28. mai 1993 um endurfígging av skuld til landskassans o.a., so er einki gjørt frá landsstýrisins síðu við teir grundleggjandi spurningarnar fyri at fáa vent gongdini støðugt afturvendandi til stjórnina at læna meiri pening, større og større upphæddir hvørja ferð, kann ikki halda fram. Vit eru komin har til, at støðan nú er so hættislig, at ein fímta ferð til Keypmannahavn helst verður tann seinasta og endaliga ferðin, áðrenn Føroyar verða limaðar inn í danska amtfelagsskapin við tí ivasama heiðurinum at vera einasta danska amtið undir umsiting av statinum.

Í avtaluni gevur danska stjórnin landsstýrinum heimild at veðhalda fyri tveimum lánum til Húsalánsgrunnin og játtar at læna 1.3 mia. til føroysku bankarnar fyri at standa ímóti við, nú danska fíggjareftirlitið hevur lækkað virðismetingina á føroyskum sethúsum rættiliga nógv.

Hóast vit á henda hátt fáa tilført munandi peningaupphæddir inn í bankarnar, verður einki lán niðurskrivað hjá sethúsaeigarunum, uttan at húsini fyrst eru seld á tvingsilssølu. Henda økta almenna skuldsetingin kemur tí ikki húsaeigaranum til góðar, men bankunum, v.ø.o. tað verður eingin skipað skuldarsanering av sethúsalánum. Ein møguleiki til í staðin at fingið eina skipaða sanering hevði verið at latið peningin, ið avsettur er í bankum uppá sethús til Húsalánsgrunin, sum síðani yvirtók skyldurnar hjá bankunum, hesum viðvíkjandi til pari kurs.

Tað er gjørd ein fyribilsfrágreiðing um, hvussu hetta skal fremjast, og heldur minnilutin, at

hetta kundi ført til, at vit fingu eina kontrollerađa heildarsanering í staðin fyri, har vit fáa eina ókontrolleraða tvangssanering, har Húsalánsgrunnurin neyvan hevur møguleika at yvirliva, og harvið eisini verður ein trupulleiki, ið landskassin og harvið skattgjaldarin kemur at hanga uppá.

Í protokollatinum frá 12. oktober verður undir punkt a sagt, at tað skulu fremjast "strukturrationaliseringer på sundheds-, uddannelses-, social og kommunikationsområderne".

Hetta er tokutala, tí eínki fæst at vita um, hvat hetta merkir. Í útkasti til avtaluna, sum fíggjarnevndin hevur fingið útbýtt, stendur eisíni:

"Rationalisering av visse uddannelsesinstitutioner." Hvørjar hesar visse eru, er ikki upplýst fyri fíggjarnevndini.

Víðari stendur:

"Med udgangspunkt i rapport fra "Rådgivningsgruppen vedrørende sundhedsvæsenet på Færøerne" tager landsstyret initiativ til en rationalisering af sundhedsvæsenet med sigte på at opnå væsentlige besparelser og et bedre fungerende sundhedsvæsen".

Hetta er greið tala, og er einasta skrivliga útgreiðing um "strukturrationaliseringer på sundhedsområdet". Minnilutin fórir hetta fram nú, soleiðis at tingmenn vita, hvat tað er, teir samtykkja. Minnilutin kann als ikki góðtaka hetta.

Undir pkt. b verður sagt:

"I aftalen fra 1. februar 1993 konstaterede landsstyret, at:
"Der var taget initiativ til revision af indtægtssikringen for fiskere, så den ydes ud fra samlet indtjening. Dette arbejde afsluttes med lovgivning inden udgangen af 1993."

Fyrsti partur er í tráð við "erklæring" frá landsstýrinum 1.2.1993, nevnliga: "der er taget initiativ ....", og tað samsvarar eisíni við veruleikan.

Føroya landsstýri legði fyri Føroya løgting løgtingsmál nr. 78/1992: Broyting í løgtingslóg nr. 32 um minstuløn, dagsstudning og minstaforvinning frá 27. mars 1992 við broyting í løgtingslóg nr. 159 frá 16. november 1992. - tann 14.1.93 fekk 1. viðgerð 21.1.93 og beint í fiskivinnunevndina. Nevndin legði fram álit 26.1.93, samtykt við 2. viðgerð 11.2.93 við 17-0 og endaliga samtykt við 3. viðgerð 23.2.93 við 17-0. Tað var tikið stig til at broyta dagsstudningin við atliti til samlaðu inntøkurnar hjá fiskimonnum, og tað málið er eisíni endaliga avgreitt í tinginum 23.2.93.

Minnilutin hevur tikið hetta fram fyri at vísa á, at avrundaðar orðingar verða av pørtunum tugdar og togaðar ymsar vegir fyri at fáa tær góðkendar av bæði føroyskum og donskum politikarum. Tí eiga tingmenn at vera fullgreiðir um avleiðingarnar, um teir samtykkja fyriliggjandi avtalu.

Tað er neyðugt, sum støðan er, at fáa kapital tilførdan til tann føroyska búskapin, men hetta gevur onga hjálp, um tað ikki samstundis verða framd tiltøk, sum gera, at peningutin verður

hjálp til sjálvhjálp, og her er tað, at Fólkaflokkurin er so grundleggjandi ósamdur við sitandi samgongu.

Nú fíggjareftirlitið hevur givið bankunum ein skáa til 1.12.93 til at fáa solvensin upp á pláss, er tað møguligt og neyðugt at taka upp samráðingar við donsku stjórnina av nýggjum, og har leggja herðslu á hesar fyritreytir:

1. At fáa tilført pening við tí fyri eyga at fáa vinnuna aftur í gongd.

2. At lækka kostnaðarstøðið í samfelagnum, bæði alment og privat soleiðis, at lønsemið aftur kemur í vinnuna.

3. Javnvág á fíggjarlógini, uttan at kostnaðarstøðið hækkar, men í staðin lækkar.

Tey uppskot, sum eru komin á tingbord saman við løgtingsmálunum nr. 15 og 16, bera ikki boð um, at landsstýrið hevur funnið nakran veg úr vanlukkuni. Løgmaður hevur sagt í løgtinginum, at landið má metast at vera í undantaksstøðu, og tað er minnilutin samdur við løgmann í. Men tí eigur løgmaður saman við sínum landsstýri at kalla alt tingið saman til kreppufundar fyri at viðgera støðuna sum slíka.

Minnilutin sær ongan bata í uppskotunum, sum fram eru komin, men tvørtur ímóti eina forðan fyri, at nakað kann betrast, tí um uppskotini verða samtykt, som koma tey at hava til fylgju, at tað virksemið, sum enn er í gongd, steðgar, og einki nýtt kemur í staðin, tí sum bankamenninir siga - einki kreditverdugt er at fíggja, og tað av góðum grundum, tí einki virksemi verður sett á stovn undir teimum umstøðum, sum vera her, og eingin privatur, sum er førur fyri at fara aðrar staðir at lívbjarga sær, verður heldur verandi. Ikki tí at hann ikki er góður við land sítt, men tí, at myndugleikarnir taka grundarlagið burtur fyri, at hetta land kann mennast, burtur. Tí verða færri og færri at bera tær størru og størru almennu byrðarnar.

Tessvegna kann minnilutin ikki taka undir við uppskotinum um at taka so stórt lán, og heldur ikki við treytunum, men vil koma á fund við løgmann at viðgera undantaksstøðuna í landinum við tí álvara, sum ein slík støða krevur. Minnilutin kundi komið við uppskotum her, men heldur tað vera rættari, at tað verður nýtt longri tíð upp á at komið við meiri konstruktivum loysnum, enn tíðin loyvir tað í sambandi við at gera álit til hesi málini.

Smbært omanfyri nevnda kann minnilutin ikki taka undir við málunum, men setir í staðin fyri uppskot landsstýrisins soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at áleggja landsstýrinum at taka upp nýggjar samráðingar við donsku stjórnina um aðrar avtalur í staðin fyri avtaluna frá 12. oktober 1993.

Hin triði minnilutin (Tordur J. Niclasen) førir fram:

Hóast tað líka frá 6. oktober 1992 bæði frá landsstýrisins og bankanna síðu hevur ljóðað, at "nú var tann føroyski bankaheimurin tryggari enn nakrantíð", so má tíverri ásannast, at einki held var í slíkum úttalilsum, og besta prógvið um tað er, at bert innan tað eina árið var fyri 4. ferð farið til Danmarkar at læna pening og gera avtalu við donsku stjórnina.

Hesa ferð var roknað við, at andstøðan varð tikin við, men so var ikki.

Tí sendi undirritaði - vegna Miðflokkin - løgmanni skriv 11. oktober 1993, har heitt varð m.a. á landsstýrið um

1) ikki at gera avtalu, hvørs avleiðingar vóru hægri skattur/størri avgjøld á føroyska skattgjaldaran,
2) ikki at gera avtalu, hvørs avleiðingar vóru, at inntøkutrygd fiskimanna verður skerd.

Í áheitanini til løgmann var at enda sagt:

"Tá hugsað verður um tey mongu túsund arbeiðsleysu, og hvussu meint mangar familjur og einstaklingar kring landið eru rakt, so eigur trygd at fáast fyri, at peningurin, sum hesa ferð verður lántur úr Danmark, sæst aftur í framleiðsluskapandi virksemi kring oyggjarnar soleiðis, at býrðarnar lætna, og vón birtist aftur fyri livilíkindum her á klettunum ..."

Tað, at peningur verður tøkur til framleiðsluskapandi virksemi, er jú av avgerandi týdningi fyri
at fortreytirnar hjá vinnulívinum batna,
at gongd kemur aftur í virksemið,
at arbeiðsloysið minkar,
at fólkaflýggjanin úr Føroyum steðgar,
at vón og áræði aftur birtast manna millum.

Tí má ásannast, at kann henda lántøka og teir, sum koma at umsita hana, ikki virka til, at gongd kemur á aftur virksemið í landinum, so "kann alt gera tað sama".

Tað liggur tí stór ábyrgd á landsstýrinum (í tann mun, tað er ført fyri tí,) og á bankaleiðsluni - nú meir enn nakran tíð - at gera metingar og taka avgerðir út frá einum samfelagsgagnligum sjónarmiði.

Tíverri er hvørki frá politiskari ella frá bankanna síðu fingin trygd fyri, at hesa ferð fer

lántøkan at síggjast aftur í øktum virksemi.

Hvat sjálvari avtaluni við donsku stjórnina viðvíkur, so ásannar minnilutin (Tordur J. Niclasen), at partur av henni er endurtøka/framhald av avtaluni frá 1. februar 1993.

Í samband við at avtalan frá 12. oktober 1993 varð undirskrivað, ljóðaði, at kravið frá danskari síðu var, at fíggjarlógin 1994 skuldi betrast við kr. 250 mió., og at danir sum so ikki løgdu seg út í tey ymisku rakstrarstøðini á fíggjarlógini. Her var bert talað um KARMIN á fíggjarlógini.

Tí er tað eisini undrannarsamt, at bert tað eina rakstrarstaðið á fíggjarlógini er undantikið, nevniliga: inntøkutrygd fiskimanna.

Tó má ásannast, at longu í avtaluni frá 1. februar 1993 sæst, at talan er um viðurskifti fiskimanna. Her verður sagt í "Erklæring fra Færøernes landsstyre", at:

> "Landsstyret konstaterer, at der er taget initiativ til revision af indtægtsikringen for fiskeri, så den ydes ud fra den samlede indtjening."

Í avtaluni frá 12. oktober 1993 er orðaljóðið tað sama, men verður skoytt uppí: "... dette arbejde afsluttes med lovgivningen inden udgangen af 1993."

Avtalan frá 1. februar 1993, har m.a. nomið varð við inntøkutrygd fiskimanna, fekk ikki færri enn 20 atkvøður í tinginum.

Hetta er at harmast um, og vil minnilutin átala, at nú verður av álvara nomið við inntøkutrygdina hjá tí eina samfelagsbólkinum. Hjá teim, sum í roynd og veru skapa fortreytir fyri, at tað í heila tikið ber til at hava annað virksemi, serliga tað almenna, gangandi.

Um tingmeirilutin er fyri at nema við inntøkutrygd fiskimanna, so átti landsstýrið eisini at gjørt "konsekvens berokningar" av, at inntøkuloft varð lagt á aðrar bólkar í samfelagnum og soleiðis tingið staðfest, kanska í eitt ávist áramál, eitt inntøkuloft pr. húski í landinum.

Í hesum sambandi slepst ikki uttan um, at peningastovnarnir viðvirka til eina loysn, t.d. í ávíst áramál at "niðurfrysta" lán hjá sethúsaeigarum.

Nógvar milliónir kundu á henda hátt verið spardar á fíggjarlógini, helst kundu fleiri komið í arbeiði og einki at ivast í, at í heila tikið hevði hetta lækkað kostnaðarstøðið í samfelagnum.

Tí eigur hetta av álvara at umhugsast, nú landið av sonnum má sigast at vera í búskaparligari undantaksstøðu.

Samsvarandi hesum verður lagt fram soljóðandi

Uppskot

til
samtyktar

Heitt verður á landsstýrið at fyrireika og leggja fyri tingið uppskot um inntøkuloft galdandi pr. húski og í hesum sambandi taka upp samráðingr við peningastovnarnar um skuldarviðurskifti lønmóttakaranna.

Hvat fiskivinnuni annars viðvíkur, so er tað umráðandi, at landsstýrið sum skjótast ger nakað ítøkiligt tii tess at bøta um støðu teirra, sum eru ringast fyri, nevniliga fiski- og útróðrarmaðurin.

Í viðmerkingum til uppskotið um avtaluna frá 12. oktober 1993 sigur landsstýrið í viðmerkingunum til uppskotið:

"Fyri at lúka fleiri av treytunum í avtaluni, verður neyðugt við lógarbroytingum, sum verða lagdar fyri tingið sum serstøk tingmál."

Fleiri av hesum tingmálunum eru løgd fyri tigið og hava fingið 1. viðgerð.

Tá minnilutin (Tórður J. Niclasen) stúrir fyri avleiðingunum, ið fleiri av uppskotunum koma at hava við sær, kann ikki takast undir við teim treytum, ið avtalan hevur fyri føroyska samfelagið.

At "ognarskattur" (rentuavgjald og fíggjarognaravgjald) nú verður sett í verk, kann bert hava við sær, at "motivini" hjá uppsparurum fyri at hava pening í bankanum hvørva og tað, saman við tí ótryggleika, sum hevur verið í føroyska bankaheiminum, koma óivað at hava við sær eina "kapitalflukt" úr bankunum og úr tí føroyska samfelagnum.

Eisini verða lán í hópatal "clearað".

Hetta førir við sær, at likviditetur bankanna versnar, og møguleikin fyri at veita fígging ferst støðugt verri.

Slík tiltøk eru ikki samfelagsgagnlig!

Eitt av uppskotum landsstýrisins leggur skatt á sparikassarnar.

Ein avleiðing av hesum fer óivað at verða, at rentan hækkar og verður tað tí lønmóttakarin, sum í síðsta enda enn eina ferð kemur at merkja sviðan av tiltøkum landsstýrisins.

Sparikassarnir hava roynst hollir, og er tað skeivt í hesum døgum at seta tiltøk í verk, sum í roynd og veru koma at forða, at júst møguleiki Sparikassanna at verða við og endurreisa føroyska samfelagið verður munandi skerdur.

Føroyska tjóðin er í álvarsligari støðu, og mangt eitt húski kring landið merkir sváru avleiðingarnar av støðuni.

Støðan átti at fingið andstøðu og samgongu at sessast við hesum setningi fyri eygað:

"Hvørji tiltøk eru neyðug at fáa gongd á aftur hetta samfelag og skapa trivnað fyri tí fólki, ið her búleikast?"

Samanumtikið kann sigast, at helst kundi meiri komið burturúr - tjóðini at gagni - í slíkum samstarvi, enn higartil í teim "loysnum", sum samgongan hevur lagt á borðið. Tað veri seg samgongan millum Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin og so sitandi samgonga millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin.

Vísandi til avleiðingarnar av tiltøkum landsstýrisins í samband við avtaluna frá 12. oktober 1993, kann minnilutin ikki taka undir við henni.

2. viðgerð 3. november 1993. Samtykt at beina uppskot landsstýrisins til 3. viðgerð við 17-0 atkvøðum.

3. viðgerð 3. novmeber 1993. Uppskotið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

Lóg nr. 184 frá 4. november 1993.

16 Avtala millum donsku stjórnina og Føroya Landsstýri um endurfígging og kapitalinnskot í bankarnar v.m.

Ár 1993, týsdagin 19. oktober legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir viðløgdu avtalu frá 12. oktober 1993 við tilhoyrandi protokollati millum donsku stjórnina og Føroya landsstýri um endurfígging í 1994 og kapitalinnskot í føroyskar bankar v.m.

Viðmerkingar:
Landsstýrið hevur áður gjørt 3 avtalur við donsku stjórnina um lán til fígging av rakstri landskassans og til innskot í teir størru føroysku bankarnar.

Eftir avtaluni frá 6. oktober 1992 veitti stjórnin landskassanum eitt lán uppá 500 mió. kr., harav 200 mió. kr. skuldu nýtast til fígging av rakstri landskassans og 300 mió. kr. vórðu nýttar til nýggjan eginpening í Sjóvinnubankan.

Eftir avtaluni frá 1. februar 1993 fekk landskassin eitt lán uppá 350 mió. kr., sum alt skuldi nýtast til nýggjan eginpening í Sjóvinnubankan.

Eftir avtaluni frá 28. mai 1993 veitti stjórnin landskassanum eitt lán uppá 1 mia. kr. Av hesum láni skuldu 560 mió. kr. nýtast til nýggjan eginpening í Sjóvinnubankan og Føroya Banka og 440 mió. kr. skuldu nýtast til gjaldføri landskassans. Eisini fekk landsstýrið tilsøgn um endurfígging av uttanlandsskuld landskassans, so hvørt lánini falla til gjaldingar.

Eftir fyriliggjandi avtalu frá 12. oktober 1993 er semja gjørd um, at landskassin fær 1,3 mia. kr. í láni at skjóta inn í Fíggingargrunnin frá 1992 at nýta til nýggjan eginpening í Sjóvinnubankan og Føroya Banka.

Herumframt gevur stjórnin tilsøgn um at veita landskassanum lán uppá 100 mió. kr. til aftrurrindan av láni úr Tjóðbankanum og eitt lán at nýta til rindan av rentuni fyrsta árið av láninum uppá 1,3 mia. kr. til bankarnar.

Í øllum avtalunum verða álagdar landsstýrinum treytir, sum stjórnin metir neyðugar at gjøgnumføra til tess at betra føroyska búskapin.

Í fyriliggjandi avtalu verða fleiri av treytunum í fyrru avtalunum endurtiknar.

Av nýggjum treytum í hesi avtaluni kunnu t.d. nevnast hesar:
1) Landsstýrið betrar fíggjarlógaruppskotið fyri 1994 við 250 mió. kr. Áður hevur treytin

verið, at javnvág skuldi vera í fíggjarlógini. Tað undirskot, sum verður á fíggjarlógini aftaná betringina, skal landskassin sjálvur fíggja við lántøku á føroyska eila danska kapitalmarknaðinum uttan ríkisveðhald.

2) Landsstýrið ger frá og við fíggjarárinum 1995 fíggjarætlanir fyri fleiri ár við føstum árligum rammusparingum innan høvuðsútreiðsluøkini.
3) Landsstýrið heldur fram við arbeiðinum at kanna møguleikarnar fyri rationaliseringum og sparingum og betri nýtslu av almennu innløkunum.

Fyri at lúka fleiri av treytunum í avtaluni verður neyðugt við lógarbroytingum, sum verða lagdar fyri tingið sum serstøk tingmál.

1. viðgerð 26. oktober 1993. Málið varð viðgjørt saman við løgtingsmáli nr. 15/1993: Løgtingslóg um lántøku til landskassan og varð beint í fíggjarnevndina, sum 3. november legði fram felagsálit.

Sí felagsálit

í

løgtingsmáli nr. 15/1993: Løgtingslóg um lántøku til landskassan.
og nr. 16/1993: Avtalan millum donsku stjórnina og Føroya Landsstýri um endurfígging og kapitalinnskot í bankarnar v.m.

2. viðgerð 3. november 1993. Broytingaruppskot minnilutans fullu við ávikavist 6-0 og 3-0 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

17 Broytingar í løgtingslóg um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning

Ár 1993, týsdagin 19. oktober legði Thomas Arabo, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 32 frá 27. mars 1992 um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning, sum broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 16. november 1992 og løgtingslóg nr. 44 frá 23. mars 1993 verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 3. nr. 1. verður orðað soleiðis:
"At inntøkan í mesta lagi er kr. 220.662.00 undanfarnu 12 mánaðirnar áðrenn túrur byrjar."
2) § 3, nr. 1, 2, 3 og 4 verða nr. 2, 3, 4 og 5.
3) § 4 verður orðað soleiðis:
"**§ 4.** Minstaløniin er kr. 12.725.00 um mánaðin ella kr. 424.17 um dagin."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om mindsteløn, dagstøtte og mindsteindtægt.

§ 1.

I lagtingslov nr. 32 af 27. marts 1992 om mindsteløn, dagstøtte og mindsteindtægt, som ændret ved lagtingslov nr. 159 af 16. november 1992 og lagtingslov nr. 44 fra 23. marts 1993 foretages følgende ændringer:

1) § 3, nr. 1 affattes således:
"At indtægten højst er kr. 220.662,00 12 måneder forud for turens begyndelse."
2) § 3, nr. 1, 2, 3 og 4 bliver nr. 2, 3, 4 og 5.
2) § 4 affattes således:
"**§ 4.** Mindstelønnen er kr. 12.725,00 om måneden eller kr. 424,17 om dagen.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Landsstýrið bant seg við avtaluni við donsku stjórnina 1. februar 1993 til at skipa fyri, at inntøkutrygdin hjá fiskimonnum var treytað av inntøku. Hetta var gjørt fyri útróðrarmenn 16. november 1992. Tá samtykti løgtingið, at maður við fiskifari, sum ikki mynstrar, skuldi missa minstaforvinningin um inntøkan fór upp um minstuløniina seinastu 3 mánaðirnar.

Skipanin, sum nú verður skotin upp fyri fiskifør, sum mynstra, verður eftir somu meginreglu. Mynstrað skip hava aftrat minstuløniini - og framum útróðrarmenn - fingið dagstudning. Eftir hesum uppskoti varðveita teir hesa upphædd, so at minstaløn og dagstudningur tilsamans verða 18.388,50 kr.

Eingi hagtøl eru tøk, sum vísa hvussu ofta tað kemur fyri, at fiskimenn, sum hava havt størri inntøku enn kr. 220.662,00 fáa endurgjald úr Lønjávningargrunninum, so ikki ber til at siga hvussu stór sparing er í hesum.

Lønjavningargrunnurin hevur royndir at umsita tílíka skipan við útróðrarmonnum og um loyvi verður at nýta skattaskipanina beinleiðis, fer broytingin ikki at krevja størri umsiting.

1. viðgerð 28. oktober 1993. Málið varð beint í fiskivinnunevndina. sum 25. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 19. oktober 1993 og eftir 1. viðgerð 28. oktober 1993 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilutа og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Jógvan A. Johannessen, Henrik Old og Karl Heri Joensen) tekur ikki undir við, at tað skal verða gjørligt at mótrokna í inntøkutrygdini hjá fiskimonnum í eftirfylgjandi túrum, um ein túrur hevur vignast væl og tekur tí ikki undir við uppskoti landsstýrisins. Í staðin fyri uppskot landsstýrisins setir meirilutin fram nýtt uppskot um broyting í løgtingslóg nr. 32 frá 27. mars 1992 um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning við seinri broytingum.

Broytingin, sum verður skotin upp er fyrst og fremst sambært avtaluni frá 1. februar 1993, har landsstýrið staðfestir, at "der er taget initiativ til revision af indtægtssikringen for fiskere, så den ydes ud fra den samlede indtjening." Landsstýrið hevur við sínum uppskoti frá 16. november 1992, løgtingsmál nr. 78/1992, lækkað dagstudningin fyri allar fiskimenn (mótrokningin broytt frá 40 oyrum til 45 oyru). Hetta hevur einki við tann seinna setningin at gera, sum sigur soleiðis: "så den ydes ud fra den samlede indtjening." Henda avtalan gongur aftur í avtaluni frá 12. oktober 1993, tá avtalan frá 1. februar 1993 ikki er fylgd.

Fyriliggjandi broytingaruppskot er sostatt í tráð við avtaluna frá 1. februar 1993. Meirilutin ger eisini vart við, at tveir av minnilutanum í fiskivinnunevndini hava atkvøtt fyri hesi avtalu. tað kann tí tykjast løgið, at hesir hava so nógv at finnast at í dag, tá teirra egnu samtyktir verða settar í verk.

Broytingin, mælt verður til at gera, ásetir, at dagstudningurin verður roknaður út á sama hátt, sum minstaløntin, t.v.s. at persónliga inntøkan fyri hvønn túrin sær verður løgd til grund og ikki einstaki fiskiparturin. Henda broyting fer ikki at ávirka dekkarar, sum fáa ein fiskipart, men teir, sum fáa meira enn ein fiskipart. Ístaðin fyri uppskot landsstýrisins, setir meirilutin tí fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 32 frá 27. mars 1992 um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning, sum broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 16. november 1992 og løgtingslóg nr. 44 frá 23. mars 1993 verður gjørd henda broyting:

Sum nýggj § 6 verður sett:

"§ 6. Til manning, mynstraða á fiskiskipum, verður latin dagstudningur. Dagstudningur verður útroknaður eftir persónligu inntøkuni hvørja veiðiferð sær:

1) Fyri
trolarar á feskfiskaveiðu,
saltfiskaskip á línuveiðu,
frystiskip á hemara- og svartkalvaveiðu v.m.,
verksmiðjutrolarar á svartkjaftaveiðu,
nótaskip,
fdnaðartrolarar,
verksmiðjutrolarar, sum salta ella frysta veiðuna umborð,
frystiskip á rækju- ella skeljaveiðu og skip á laksaveiðu
verður við núverandi minstuløn veitt hvørjum manni eyka fyri hvønn mynstraðan dag á túrinum tað, sum er munurin millum 8 vanligar tímalønir í sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag og 1/30 av mánaðarminstulønini. Henda viðbót verður lækkað við 45 oyrum fyri hvørja krónu, sum inntøkan, íroknað minstuløn og manningarstudning fyri hvønn dagin, fer upp um 1/30 av galdandi mánaðarminstuløn.

2) Fyri manning, mynstraða á fiskiskipum, sum ikki kemur undir reglurnar undir 1) og minstaforvinning, verður henda regla galdandi: er inntøkan,

lagtingslov om ændring i lagtingslov om mindsteløn, dagstøtte og minsteindtægt.

§ 1.

I lagtingslov nr. 32 af 27. marts 1992 om mindsteløn, dagstøtte og mindsteindtægt, som ændret ved lagtingslov nr. 159 af 16. november 1992 og lagtingslov nr. 44 af 23. marts 1993 foretages følgende ændring:

Som ny § 6 indsættes:

"§ 6. For mandskab, påmønstret fiskefartøjer, bliver udbetalt dagstøtte. Dagstøtte beregnes ud fra den personlige indtægt hver fisketur:

1) For
trawlere på fiskeri efter ferskfisk,
saltfiskeskibe på linefiskeri,
fryseskibe på fiskeri efter sildehaj eller hellefisk m.m.,
fabrikstrawlere på fiskeri efter sortmund,
ringnotskibe,
industritrawlere,
fabrikstrawlere, som nedsalter eller fryser fangsten ombord,
fryseskibe på fiskeri efter rejer eller muslinger og skibe på fiskeri efter laks ydes med nuværende mindsteløn hver mand ekstra for hver påmønstret dag på turen differencen mellem 8 timelønner i overenskomsten mellem Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag og 1/30 af månedsmindstelønnen. Dette tillæg reduceres med 45 øre for hver krone, som indtægt, incl. mindsteløn og mandskabsstøtte pr. dag overstiger 1/30 af gældende månedsmindsteløn.

2) For mandskab, påmønstret fiskeskibe, som ikke er omfattet af reglerne under pkt. 1) og mindsteindtægt, gælder følgende regel:

froknað prísískoyti, minstuløn og manningarstudning, samanlagt minni enn 8 vanligar tímaløntr eftir tí í § 6, pkt. 1 nevnda sáttmála, verður munurin goldin sum serlig viðbót."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Hvis indtægt, incl. pristilskud, mindsteløn og mandskabsstøtte sammenlagt er mindre end 8 timelønner efter den i § 6, stk. 1 nævnte overenskomst, betales differencen som særligt tillæg."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) førir fram: Sambært framløgdu viðmerkingunum hjá Føroya landsstýri verður sagt: "Landsstýrið bant seg við avtaluni við donsku stjórnina 1. februar 1993 til at skipa fyri, at inntøkutrygdin hjá fiskimonnum var treytað av inntøku".

At nýta avtaluna frá 1. februar 1993 sum grundgeving fyri at leggja fyriliggjandi uppskot fyri løgtingið er heilt burturvið. Vit vístu á hetta undir viðgerðini av løgtingsmáli nr. 16/1993 viðvíkjandi avtaluni millum donsku stjórnina og Føroya landsstýri frá 12. oktober 1993. Í avtaluni frá 1. februar 1993 váttar Føroya landsstýri: "der er taget initiativ til revision af indtægtssikringen for fiskerne, så den ydes ud fra den samlede indtjening." Tað vil siga, at tað var tikið stig til, og tað er eisini rætt.

Tann 16. november 1992 legði Føroya landsstýri fyri løgtingið løgtingsmál nr. 78/1992. Ífetta uppskot gekk út upp á at lækka dagstudningin í mun til inntøkuna. Hetta mál fekk 1. viðgerð 21. januar 1993 og varð beint í fiskivinnunevndina. Nevndin legði álit fram 26. januar 1993, samtykt við 2. vigerð 11. februar 1993 við 17-0 atkvøðum og endaliga samtykt við 3. viðgerð 23. februar 1993 við 17-0 atkvøðum.

Sum tað sæst, so var málið til viðgerðar í løgtinginum 1. februar 1993, og var hetta uppskot á borðinum undir samráðingunum í Keypmannahavn. Orðingin um váttan um inntøkutrygdina í avtaluni 1. februar 1993 hevur útgangsstøði í hesum máli, sum 23. februar 1993 varð endalig og harvið uppfylgt.

Í avtaluni frá 28. mai 1993 verður einki sagt um inntøkutrygd fiskimanna. Men við avtaluni frá 12. oktober 1993 verður vent aftur til inntøkutrygdina, og nú verður sagt: "I aftalen fra 1. februar 1993 konstaterede landsstyret, at: Der var taget initiativ til revision af indtægtssikringen for fiskere, så den ydes ud fra samlet indtjening. Dette arbejde afsluttes med lovgivning inden udgangen af 1993."

Tað er henda staðfesting, sum nú ríður samgonguni sum hin versti. Vit minnast øll, at tað tók bert 2 tímar at verða samd við donsku stjórnina um avtaluna 12. oktober 1993, men 8 tímar at semjast um orðingina í avtaluni. Hetta sigur ikki so lítið um, hvussu orðingarnar skulu verða, soleiðis at danska stjórnin skal kunna fáa donsku fólkatingslimirnar at góðtaka avtalur, og at Føroya landsstýri skal kunna fáa løgtingsmenn hjá samgonguni at góðtaka somu avtalu.

At hetta nú eitt ár seinni verður gjørt til eitt diplomatiskt stórmál millum donsku stjórnina og Føroya landsstýri er at undrast á, og má koma av, at okkara samráðingarmenn hava latið seg

tølað av øðrum.

Tá avtalan er góðkend av báðum tingunum byrjar orrustan um, hvussu tann ógreitt formulerøða avtalan skal skiljast, og stórir politiskir trupulleikar standast av hesum.

Tað undrar eisini stórliga, at formaður fiskivinnunevndarinnar ferð eftir ferð í fjølmiðlunum hevur borið fram, at uppskot landsstýrisins fór ikki at koma allur úr nevndini, fyri síðani við stórum skundi at kalla saman fiskivinnunevndina 23. mars 1994 kl. 16.00, har 4 av 7 nevndarlimum vóru eykalimir og leggja fram eitt broytingaruppskot í staðin fyri uppskot landsstýrisins. Tað var eyðsæð, at málið hevði miklan skund, tí andstøðan fekk ikki langt skotbráð at viðgera málið, sum í veruleikanum hevði ligið í fiskivinnunevndini síðani 28. oktober 1993.

Tað sær út til, at málið nú má framieggjast í løgtingið sum skjótast av tí, at danski statsministarin skal svara spurningum í PØ-nevndini viðvíkjandi leiklutinum hjá løgmanni og statsministaranum.

Hin vegin hava manningarfeløgini gjørt greitt, at verður lógarbroyting framd á hesum øki, eftir trýsti frá donsku stjórnini, sum ein partur av avtalum millum stjórnina og Føroya landsstýri, og at hesin verkabólkur, sum tann einasti skal missa vunnin rættindi, so vilja teir leggja allan flotan beinanvegin.

Tað er tí at undrast á, at sitandi samgonga, og serliga Tjóðveldisflokkurin, ikki himprast við at valdtaka tann føroyska fiskimannin fyri at renna ørindi fyri danska statsministaran.

Fólkaflokkurin tekur hvørki undir við uppskoti landsstýrisins ella við uppskotinum frá meirilutanum í fiskivinnunevndini og ger hetta greitt, at tað vit bundu okkum til tann 1. februar 1993, varð uppfylt við samtykt av løgtingsmáli nr. 78/1992 tann 23. februar 1993.

Minnilutin (Jógvan I. Olsen) tekur ikki undir við málinum.

Minnilutin (Niels Pauli Danielsen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins og heldur ikki undir við uppskotinum hjá meirilutanum í fiskivinnunevndini.

Uppskotið um skerjingar í inntøkutrygdini hjá fiskimonnum hevur eins og samtykta uppskotið um kvotuskipan fyri fiskiskap á Føroyagrunninum sína grund í avtaluni millum Føroya landsstýri og donsku stjórnina frá 12. oktober 1993.

Henda avtala varð hin 19. oktober 1993 løgd fyri Løgtingið og samtykt hin 3. november 1993 við øllum teimum 17 atkvøðunum hjá samgonguni (Javnaðarflokkinum, Tjóðveldisflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum).

Síðan hevur tað tikst, sum samgongumenn hava ikki vitað til fulnar, hvat ið tað er, teir hava atkvøtt fyri og samtykt.

Sigast kann bæði um lógina um kvotuskipan og uppskotið um skerjingar í inntøkutrygd

fiskimanna, at landsstýrið við teimum bjóðar vinnulívinum á sjógvi av og vil hava eisini tað sindri, sum framvegis hórar, til at støðga upp.

Uppskotið um skerjingar í inntøkutrygd fiskimanna varð lagt fyri løgtingið hin 20. oktober 1993 og varð við 1. viðgerð hin 28. oktober 1993 beint í fiskivinnunevndina.

Sum við uppskotinum um kvotuskipan tekur heldur eingin limur í nevndini undir við hesum uppskoti um skerjingar í inntøkutrygdini, og formaðurin í nevndini hevur sett sítt góða navn og umdømi í veð fyri, at málið skuldi ikki koma úr aftur nevndini.

Álíkavæl má hann nú enn einaferð lúta og boyggir seg fyri donskum kravi um, at nú skal hetta fáast í lag, áðrenn Nyrup Rasmussen, ríkismálaráðharri, hin 7. apríl 1994 møtir til samráð í politisku búskaparligu nevndini hjá danska fólkatinginum.

Fakfeløgini hava áhaldandi víst á tað órímiliga í tí, at lagt verður bara eftir fiskimonnum, sum eru tað teir, ið hava skuldina av øllum trupulleikunum í Føroyum.

Feløgini hava mótmælt, at fiskimenn verða gjørdir til kastibløkur í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmørk, og hava tey skrivliga boðað frá, at flotin verður lagdur við brestin, um inntøkutrygdin á nakran hátt verður skerd.

Í ikki minni enn tveimum brøvum til Føroya Fiskimannafelag (5. mars og 9. desember 1993) hevur Nyrup Rasmusasen, ríkismálaráðharri, váttað, at danska stjórnin leggur seg ikki útí, hvussu løgting og landsstýri fáa til vega javnvág á figgjarlógini.

Tað má tí haldast vera landsstýrisins ábyrgd og samgongumeirilutans á tingi, at hesi viðurskifti verða loyst uttan at skerja inntøkutrygd fiskimanna.

Verður uppskotið um skerjingar í inntøkutrygd fiskimanna kortini samtykt, sum meirilutin í fiskivinnunevndini skjýtur upp, er tað bara ein roynd til at bjarga Maritu Petersen, løgmanni, og Kjartani Hoydal, fiskivinnustjóra, sum í skrivi til ríkismálaráðharran í Danmørk hin 2. mars 1994 hava sagt ósatt, tá ið tey søgdu "udbetalingen kan ændres administrativt", og tá ið tey søgdu, at Lønjavningargrunnurin longu var farin undir at broyta "praksis" við útgjaldingini av dagstudningi, sum bæði stjórn og stýrið fyri Lønjavningargrunnurin síðan bæði hava avsannað og avvist.

Allur útflutningur okkara stavar frá fiski. Tí eru teir, ið fiskin veiða og fáa hann til lands, ryggurin í føroyska samfelagnum, og tað tænir ongum endamáli at leggjast á inntøkur teirra, sum longu frammanundan er minkað munandi, m.a. við at prísískoytið úr landskassanum er burturdottið.

Fiskimenn okkara hava ongan skattafrádrátt sum í grannalondum okkara, Íslandi, Noregi og Danmørk, og vandi er fyri, at hesin ágangur á fiski- og útróðrarmenn fær uppaftur fleiri fólk at flyta av landinum.

Heldur átti bæði danska stjórnin, landsstýrið og fiskivinnunevndin at studla Føroya Fiskimannafelag í royndum teirra at ganga nýggjar leiðir, so sum royndir eftir svartkalva við gørnum, sum hevur givið 100 fólkum arbeiði og landskassanum nógvar milliónir aftrat í

inntøku.

Saman um tikið gevur uppskotið hjá meirilutanum í fiskivinnunevndini bara 3 mió. kr. í sparingum fyri landskassan, tá ið meir enn helmingurin av teimum 7 mió. kr., ið ætlanin er at spara, er skattur til landskassan.

Havandi støðu landsins í huga, viðurskiftini hjá teimum arbeiðsleysu og Arbeiðsloysisgrunnurin, sethúsaeigarum og nú flotanum, ið verður lagdur, um uppskot meirilutans í fiskivinnunevndini verður samtykt og lýst, loyvir undirritaði sær at skjóta upp, at landsstýrið í staðin leggur frá sær.

Tí at samfelagið er alt støðgað upp og má fáast aftur í gongd til tess krevst nýggj samgonga og nýtt fólk. Tí verður sett fram soljóðandi

U p p s k o t

til
samtyktar

Føroya løgting samtykkir at skriva út nýval beinanvegin.

2. viðgerð 7. apríl 1994. Málið varð beint aftur í fiskivinnunevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Á l i t II

Málið varð undir 2. viðgerð 7. apríl 1994 við 21-0 atkvøðum beint aftur í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið aftur og hevur undir viðgerðini havt fund við formenninar í Føroya Fiskimannafelag og Føroya Skipara- og Navigatørfelag. Eisini hevur nevndin havt fund við Maritu Petersen, løgmann.

Umboðini fyri manningafeløgini boðaðu frá, at teir kundu góðtaka uppskotið, um grundarlagið fyri útrokningini av dagstudninginum verður fiskipartur + tann partur, sum fer upp um samlað 2,5 partar. Ein treyt frá feløgunum er, at allir fáa somu frítíðarløn av minstuløn og dagstudningi.

Marita Petersen, løgmaður, greiddi nevndini frá gongdini í samráðingunum millum landsstýrið og donsku stjórnina um fíggjarstøðu landsins. Løgmaður gjørdi greitt, at neyðugt er at spara 7 mió. kr. í dagstudninginum.

Nevndin mælir løgtinginum til, at taka uppaftur 2. viðgerð av málinum og boðar samstundis, at broytingaruppskot verður sett fram millum 2. og 3. viðgerð, sum m.a. tryggjar, at frítíðarlønin ikki er við í "persónligu inntøkuni".

Framhaldandi 2. viðgerð 12. apríl 1994. Broytingaruppskot frá meirilutanum í fiskivinnu-

nevndini samtykt við 17-0 atkvøðum.

15. apríl legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til
3. viðgerð

Meirilutin í fiskivinnunevndini (Heini O. Heinesen, Jógvan A. Johannessen, Henrik Old og Karl Heri Joensen) førir fram, at tað kann ikki góðtakast, at lønarviðurskiftini hjá einum ávísum lønarbólki, inntøkutrygd fiskimanna, verður tikin við í avtalur ímillum donsku stjórnina og Føroya landsstýri, so sum dømi er um her um føroyskar fiskimenn.

Vísandi til tey skriv, sum danski forsætismálaráðharrin hevur sent í svari til Føroya Fiskimannafelag 9. desember 1993, har hann váttar frásøgn frá 8. mars 1993, har hann greitt sigur frá, at hann ikki leggur seg út í, hvussu heimastýrið fær eina betri javnvág í á tiggjarlógini, samstundis sum hann 3. mars 1994 í skrivi til Maritu Petersen, løgmann, heldur fast við avtaluna frá 1. februar 1993, sum endurtikið í avtaluni frá 12. oktober 1993, kennir meirilutin seg rættiliga ørkymlaðan av hesum máli.

Hóast hesar viðmerkingar ásannar meirilutin í fiskivinnunevndini, at avtalan frá 1. februar 1993 varð samtykt í løgtinginum við ikki færri enn 19 atkvøðum, sum endurtikið aftur í avtaluni frá 12. oktober 1993, sum bert fekk tær 17 atkvøðurnar frá samgonguni.

Síðani nýggj samgonga varð skipað, er tað nú komið fram, at teir sum gjørdu og samtyktu avtaluna frá 1. februar 1993 nú skulka sær undan sínum egnu avtalum og samtyktum á tingi.

Meirilutin er varðugur við, at tað kemur at fáa sera óhepnar fylgir um allir eykapartarnir verða tiknir við í mótrokningina í dagstudningunum. Meirilutin mælir tí til, at broyta uppskotið soleiðis, at dagstudningurin verður útroknaður eftir 1,25 fiskiparti og at frítíðarlønin ikki er íroknað. Samsvarandi hesum setir meirilutin fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 1, 1. stk., 2. punktum verður orðað soleiðis:
"Dagstudningurin verður útroknaður eftir 1,25 fiskiparti hvørja veiðiferð sær, frítíðarløn ikki íroknað:"

§ 1, 1. stk., 2. punktum formuleres således:
"Dagstøtte beregnes af 1,25 fiskeandel hver fisketur, ferieløn ikke medregnet:"

Minnilutin (John Petersen, Jógvan I. Olsen og Niels Pauli Danielsen) mælir til, at dagstudningurin verður útroknaður sum ein fiskipartur + tann partin, sum fer upp um tveir partar hvørja veiðiferð sær.

Minnilutin metir, at uppskotið kann góðtakast bæði av avvarðandi verkafeløgum og donsku stjórnini sambært brævi 8. apríl 1994 frá Poul Nyrup Rasmussen, har hesin m.a. sigur: "Det er korrekt, at vi fra dansk side ønskede, at en revision af denne ordning indgik som en del af de budgetændringer, der også kunne bidrage til bedre balance i landsstyrets finanser.

Selv efter revisionen af loven den 23. marts 1993 kan der fortsat udbetales indtægtsstøtte til indkomster, der ligger på et meget højt niveau. Dette er baggrunden for, at indtægtssikringen fortsat indgår i aftalerne mellem regeringen og landsstyret."

Minnilutin mælir løgtinginum til at samtykkja broyting í inntøkutrygd fiskimanna, sum sker toppin av teimum hægstu inntøkunum. Uppskotið vil fyribyrgja verkfalli, sum fráboðað er, og samstundis tryggja, at umfígging fæst frá donsku stjórnini. Samsvarandi hesum setir minnilutin (John Petersen, Jógvan í. Olsen og Niels Pauli Danielsen) fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 1. 1. stk., 2. punktum verður orðað soleiðis:
"Dagstudningurin verður útroknaður sum 1 fiskipartur + tann partin, sum fer upp um 2 partar hvørja veiðiferð sær:"

§ 1, 1. stk., 2. punktum formuleres således:
"Dagstøtte beregnes som 1 fiskeandel + den andel, der overstiger 2 andele hver fisketur:"

3. viðgerð 15. apríl 1994. Broytingaruppskotið frá minnilutanum fall við 10-0 atkvøðum. Broytingaruppskotið frá meirilutanum samtykt við 17-0 atkvøðum. Málið endaliga samtykt við 17-9 atkvøðum.

18 Broytingar í løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan

Ár 1993, mikudagin 20. oktober legði Thomas Arabo, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 34 frá 3. mars 1993 um stuðul til feskfiskaflotan verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 3, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"Stk. 4. Stuðul verður latin fyri landingar í Føroyum. Landsstýrið ásetir reglur fyri, hvussu stuðulin verður lækkaður fyri túrar, tá avreitt verður uttanlands. Landsstýrið kann eisini leggja á sum treyt fyri stuðlinum, at ávísur prosentpartur av veiðini hjá fiskifarinum verður seldur um upp boðssølu, sum landstýrið hevur góðkent"
2) § 3, stk. 5 gongur út.
3) § 4, stk. 2 og 3 ganga út og § 4, stk. 4 verður § 4, stk. 2.
4) § 5 verður orðað soleiðis:
"§ 5. Hildið verður uppat at útgjalda stuðulin, tá fiskifar ikki er í vinnu ella skiftir eigara."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om støtte til ferskfiskeflåden.

§ 1.

I lagtingslov nr. 34 af 3. marts 1993 om støtte til ferskfiskeflåden foretages følgende ændringer:

1) § 3, stk. 4 affattes således:
"Stk. 4. Tilskud ydes for landinger på Færøerne. Landsstyret fastsætter regler for hvorledes tilskuddet reduceres for de ture, hvor fangsten er afsat i udenlandsk havn. Landsstyret kan også, som betingelse for tilskuddet, fastsætte, at en bestemt procentdel af skibets fangst sælges på en auktion, der er godkendt af landsstyret."
2) § 3, stk. 5 udgår.
3) § 4, stk. 2 og 3, udgår.
4) § 4, stk. 4, bliver § 4, stk. 2.
5) § 5 affattes således:
"§ 5. Udbetalingen af tilskuddet standser, når et fiskerfartøj går ud af drift eller skifter ejer."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar

Tá løgtingið í mars samtykti lógina um umsetiligan fløgustuðul, var hugsanin hon, at henda skipan fór at eggja teimum, sum áttu fiskifør, til at leggja saman veiðiloyvi og á tann hátt minka um veiðiflotan, so hann betur kom at samsvara við tilfeingið. Stuðulin skuldi eisini styðja upp undir, at hin besti parturin av veiðiflotanum hevði livimøguleikar.

Tær ógvusiigu búskaparligu rembingarnar í føroyska samfelagnum síðani hava ført við sær, at hendan skipan ongantíð er komin at virka og einki dømi er um, at veiðiloyvi er latið endaliga inn móti at fáa stuðulin útgoldnan. Annars tykist fløgustuðulin mest at hava havt ta avleiðing, at fløgustuðulin verður lagdur afturat prísinum, tá skip verða seld.

Landsstýrið fer í næstum at leggja fram uppskot um umsetiligar kvotur. Hendan lóg er ætlað at tryggja, at flotin lagar seg til tilfeingið og er tá ikki tørvur á, at fløgustuðulin er umsetiligur ella at veiðiloyvi verða løgd saman.

Tað er hugsan landsstýrisins, at tað er rætt at varðveita fløgustuðulin til feskfiskaflotan annars sum eina hjálp tey 3-5 árini mett verða koma at ganga til fiskastovnarnir eru komnir á føtur aftur.

Í § 3, stk. 4 er ordingin í lógini óroytt, so tað ber til hjá landsstýrinum at loyva landingum uttanlands og broyta krøvini um, hvussu nógv skal fara um uppboðssølu. Tað er hugsan landsstýrisins, at eftir endurskipanina av fiskivinnuni á landi í Føroya Fiskavirking, kann verða neyðugt at tryggja, at kapping er um fiskaprísir., við at geva fiskiførunum meira frælsi at selja, har sum besti prísur fæst.

1. viðgerð 28. oktober 1994. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 28. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 19. oktober 1993 og eftir 1. viðgerð 28. oktober 1993 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið.

Landsstýrið mælir til at broyta orðingina í § 3. stk. 4 soleiðis, at landsstýrið kann loyva landingum uttanlands. Nevndin er samd um, at 30% av veiðuni kann landast uttanlands, uttan at mótroknað verður í stuðlinum. Nevndin er eisini samd um, at tá skip fara í alternativa vinnu, skal landsstýrið í kunngerð, góðkendari av fiskivinnunevndini, loyva, at fløgustuðulin verður varðveittur um landað verður uttanlands.

Landsstýrið mælir eisini til í uppskoti sínum at broyta krøvini um, hvussu stórur partur av veiðini skal fara um uppboðssølu. Fiskivinnunevndin er samd um, at varðveita verandi skipan, at í minsta lagi 33% av veiðini verður seld á uppboðssølu, sum landsstýrið hevur góðkent.

Landsstýrið hevur eisini skotið upp at gera broytingar í §§ 4 og 5, viðvíkjandi stuðlinum, um veiðiloyvi verður latið inn, um fiskifarið verður umbýtt við annað far og við eigaraskifti. Nevndin tekur ikki undir við hesum broytingum, men mælir til at gera aðrar broytingar í nevndu greinum í staðin fyri.

Samsvarandi hesum setir fiskivinnunevndin, í staðin fyri uppskot landsstýrisins fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 34 frá 3. mars 1993 um stuðul til feskfiskaflotan verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 3., stk. 4. verður orðað soleiðis:
"Stk. 4. Stuðul verður latin fyri landingar í Føroyum. Upp til 30% av veiðuni kann landast uttanlands uttan at mótroknað verður í stuðlinum. Tá skip fara í alternativa vinnu, sum landsstýrið ásetur í kunngerð, góðkend av fiskivinnunevndini, kann landsstýrið loyva, at fløgustuðulin verður varðveittur, um landað verður uttanlands."

2) § 4., stk. 2. verður orðað soleiðis:
"Stk. 2. Stuðulin kann eftir umsókn verða útgoldin, um veiðuloyvið verður latið landsstýrinum endaliga. Verður fiskifarið umbýtt við annað yngri fiskifar, sum hevur somu ella minni veiðuorku fylgir stuðulinum hjá uppruna fiskifarinum við. Verður fiskifar innflutt má tað ikki vera eldri enn 10 ár."

3) § 4., stk. 3. gongur út og § 4., stk. 4. verður § 4., stk. 3.

4) § 5. verður orðað soleiðis:
"§ 5. Hildið verður uppat at útgjalda stuðulin, tá fiskifar ikki er í vinnu.
Stk. 2. Tekniskar broytingar í fiskifarinum eftir gildiskomu av broytingini av hesi lóg ávirkar ikki stuðulsupphæddina.
Stk. 3. Tá ið eigaraskifti fer fram, verður tað, sum er eftir av stuðlinum, flutt við til nýggju eigaranum."

lagtingslov om ændring i lagtingslov om støtte til ferskfiskeflåden.

§ 1.

I lagtingslov nr. 34 af 3. mars 1993 om støtte til ferskfiskeflåden foretages følgende ændringer.

1) § 3., stk. 4. affattes således:
"Stk. 4. Tilskud ydes for landinger på Færøerne. Op til 30% af fangsten kan afsættes i udenlandsk havn uden at der modregnes i tilskuddet. Såfremt skib driver alternativ fangst, som landsstyret fastsætter i kundgørelse, godkent af fiskeriudvalget, kan landsstyret tillade, at tilskuddet bibeholdes, såfremt fangsten ilandsættes i udenlandsk havn".

2) § 4., stk. 2. affattes således:
"Stk. 2. Tilskudet kan efter ansøgning udbetales, såfremt fiskeritilladelsen definitivt indleveres til landsstyret. Såfremt fiskefartøjet erstattes med andet yngre fiskefartøj, der har samme eller mindre fangstkapacitet følger tilskudet til det oprindelige fiskefartøj med. Bliver fiskefartøj indført må det ikke være over 10 år gammelt."

3) § 4., stk. 3. udgår og § 4., stk. 4. bliver § 4., stk. 3.

4) § 5. affattes således:
"§ 5. Udbetalingen af tilskudet ophører, når fiskefartøj ikke er i drift.
Stk. 2. Tekniske ændringer i fiskefartøjet efter, at ændringen i denne lov er sat i kraft ved kundgørelse, påvirker ikke størrelsen af det tilskud.
Stk. 3. Ved ejerskifte kan det, der er tilbage af støtten, overføres til de

nye ejere."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir hon er kunngjørd og galdandi frá 17. mars 1994.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen og gælder fra 17. mars 1994.

2. viðgerð 28. apríl 1994. Atkvøðugreiðslan útsett.

Atkvøðugreiðsla 9. mai 1994. Broytingaruppskotið frá fiskivinnunevndini varð samtykt við 32-0 atkvøðum.

19. mai 1994 legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

B r o y t i n g a r n p p s k o t

til

3. viðgerð

I) Í uppskotinum frá fiskivinnunevndini § 1., nr. 1 verður orðið "veiðuni" broytt til "ársveiðuni" og aftaná 2. punktum verður sett aftaná orðið "stuðulinum": "Henda regla er galdandi frá 17. mars 1994."

2) Í uppskotinum frá fiskivinnunevndini § 1., nr. 2. verður skoytt uppí: ", tó træskip undir 110 BRT ikki eldri enn 20 ár".

3) § 2. verður soljóðandi:
"Henda lóg fær gildi dagin eftir, hon er kunngjørd."

1) I forslaget fra fiskeriudvalget § 1., nr. 1 ændres ordet "fangsten" til "årsfangsten" og efter 2. punktum sættes efter ordet "tilskudet": "Denne regel gælder fra 17. mars 1994."

2) I forslaget fra fiskeriudvalget § 1., nr. 2. tilføjes: ", dog træskib under 110 BRT ikke over 20 år".

3) § 2. formuleres således:
"Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen."

3. viðgerð 19. mai 1994. Broytingaruppskot frá fiskivinnunevndini til 3. viðgerð samtykt við 30-0 atkvøðum. Uppskotið endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

Lóg nr. 83 frá 18. mai 1994.

19 Løgtingslóg um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald

Ár 1993, týsdagin 19. oktober legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald.

§ 1. Av teim í § 2 nevndu ognum verður goldið rentuavgjald ella fíggjarognaravgjald til landskassan.

§ 2. Avgjaldsskyldan eftir hesi lóg fevnir um:
1) Ogn, ið er innistandandi á konti í føroyskum peningastovnum og postgiro,
2) ognarvinningur av ogn, ið er innistandandi á konti í útlendskum peningastovnum,
3) virðisbrøv, tó ikki partabrøv í partafeløgum v.m. skrásett í Føroyum sbr. § 1, nr. 8 í skattalógini.

§ 3. Avgjaldsskyldan av ogn fevnd av § 2, nr. 1) liggur á øllum kontohavarum, tó undantikið:
1) persónar, sum ikki hava bústað í Føroyum og ikki eru umfataðir av § 1 ella § 2 í skattalógini,
2) útlendsk feløg og felagsskapir, ið ikki koma undir skattskyldu eftir skattalógini,
3) danska ríkið,
4) landskassi Føroya,
5) tær stovnanir, har ið inntøkur og útløgur eru fyriskipaðar í fíggjarlógum danska ríkisins ella løgtingsins og virki og stovnar, sum landið eigur, og sum verða roknir fyri landskassans rokning,
6) kommunur,

lagtingslov om renteafgift og afgift af finansielle aktiver.

§ 1. Af de i § 2 nævnte formuer betales renteafgift eller afgift af finansielle aktiver til landskassen.

§ 2. Afgiftspligten efter denne lov omfatter:
1) Formue, som er indestående på konti i færøske pengeinstitutter og postgiro,
2) formueafkast af formue som er indestående på konti i udenlandske pengeinstitutter,
3) værdipapirer, dog ikke aktier i aktieselskaber m.v indregistrerede på Færøerne jfr. § 1, nr. 8 i skatteloven.

§ 3. Afgiftspligten for formue omfattet af § 2, nr. 1) påhviler alle kontohavere med undtagelse af:
1) personer, som ikke har bopæl på Færøerne, og som ikke er under skattepligt efter § 1 eller § 2 i skatteloven,
2) udenlandske selskaber og foreninger, som ikke er skattepligtige i henhold til skatteloven,
3) staten,
4) Færøernes landskasse,
5) de institutioner, hvis indtægter og udgifter bestemmes ved rigets eller de færøeske finanslove, samt virksomheder og institutioner, der ejes af lagtinget og som drives for landskassens regning,

7) virki og stovnanir, sum eru ogn kommununar, og sum verða rikin fyri kommunanna rokning,
8) Tjóðbanki Danmarkar.
9) Landsbanki Føroya.

§ 4. Avgjaldsskyldan av ognarvinningi av ogn fevnd av § 2, nr. 2) og avgjaldsskyldan fyri ogn fevnd av § 2, nr. 3) liggur á øllum, ið sambært § 1 í skattalógini eru ásett at vera skattgjaldarar, ið hava fulla skattskyldu, og hava skattligan heimstað í Føroyum.
Stk. 2. Eisini hava føroyskir sparikassar, Tryggingarsambandið Føroyar og allar deildir tess, Fleggingargrunnurin fyri Føroyar, Menningargrunnur Ídnaðarins, Føroya Ídnaðargrunnur, Færøernes Realkreditinstitut og Fíggingargrunnurin fyri 1992 skyldu at rinda rentuavgjald av ognarvinningi av ogn teirra, fevnd av § 2, nr. 2) og ognargjald av ogn teirra fevnd av § 2, nr. 3).

§ 5. Avgjaldsgrundarlagið fyri tær í § 2, nr. 1 nevndu ognir, fevnir um tær peningaanøgdir, sum bera eina og hvørja rentutilskriving á konti innskjótaranna, uttan mun til hvat slag av konto talan er um, tó ikki ogn innistandandi á :
1) konti fyri bundnari uppsparing sambært løgtingslóg nr. 70 frá 3. juli 1989 um bundna uppsparing,
2) klientkonti.
Stk. 2. Kontohavararnir bera avgjaldið, men verður tað av peningastovni ella postgiro kontohavarans vegna rindað beinleiðis í landskassan hurturav tí tilskrivaðu rentuni á tí konto, ið avgjaldið viðvíkur.
Stk. 3. Fíggjarognaravgjaldið verður rindað av tilskrivaðu rentuni, eftir at hon er minkað við rentuskatti sambært løgtingslóg nr. 87 frá 5. juni 1992 um rentuskatt.
Stk. 4. Avgjaldsupphædd kravd eftir stk. 2 skal av avvarðandi peningastovni ella postgiro í seinasta lagi 15. í mánaðinum aftaná eina og hvørja rentutilskriving av-

6) kommuner,
7) virksomheder og institutioner, der ejes af kommunerne og som drives for kommunernes regning,
8) Danmarks Nationalbank.
9) Landsbanki Føroya.

§ 4. Afgiftspligten for formueafkast af formue omfattet af § 2, nr. 2) og formue omfattet af § 2, nr. 3) påhviler alle, der i henhold til reglerne i skattelovens § 1, er at betragte som skattesubjekter under fuld skattepligt og som har skattemæssigt hjemsted på Færøerne.
Stk. 2. Endvidere påhviler det de færøske sparekasser, Tryggingarsambandið Føroyar og alle dets afdelinger, Fleggingargrunnurin fyri Føroyar, Menningargrunnur Íðnarins, Føroya Ídnaðargrunnur, Færøernes Realkreditinstitut og Finansieringsfonden af 1992 pligt til at betale renteafgift af formueafkastet af deres formuer omfattet af § 2, nr. 2) og formueafgift af deres formue omfattet af § 2, nr. 3).

§ 5. Afgiftsgrundlaget for de i § 2, nr. 1 nævnte formuer omfatter det kapitalbeløb, der danner basis for enhver rentetilskrivning på indskydernes konti, uanset kontoform dog med undtagelse af:
1) konti for bunden opsparing i henhold til lagtingslov nr. 70 af 3. juli 1989 om bunden opsparing,
2) klientkonti.
Stk. 2. Afgiften påhviler kontohaverne, men betales direkte på kontohavernes vegne til landskassen af pengeinstituttet og postgiro af den tilskrevne rente på den konto afgiften vedrører.
Stk. 3. Afgiften betales af den tilskrevne rente, efter at denne er reduceret med renteskat i henhold til lagtingslov nr. 87 af 5. juni 1992 om renteskat.
Stk. 4. Opkrævet afgiftsbeløb i henhold til stk. 2 skal af pågældende pengeinstitut eller postgiro senest 15. i måneden efter en og hver rentetilskrivning være afregnet til landskassen. Pengeinstitutter og postgiro

roknast til landskassan. Peningastovnar og postgiro skulu samstundis lata Toll- og Skattstovuni yvirlit yvir kravdu avgjøldini, við m.a upplýsingum um nøvn á kontohavarum, kontosløg og rentustig. Landsstýrið kann við kunngerð áseta neyvari reglur fyri upplýsingarskyiduni hjá peningastovnum og postgiro eftir hesum stk.

Stk. 5. Verða avgjøldini ikki goldin landskassanum rættstundis, skal avvarðandi peningastovnur ella postgiro gjalda 1,5% í mánaðarligari rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá og við forfalsdegnum at rokna.

§ 6. Avgjaldsgrundarlagið fyri tær í § 2, nr. 2 nevndu ognir fevnir um ognarvinning á konti innskjótaranna uttan mun til, hvat slag av konto talan er um.

Stk. 2. Kontohavarar, ið eru undir avgjaldsskyldu eftir § 4, hava skyldu til at geva tann í § 2, nr. 2) nevnda ognarvinning upp til skattingar í seinasta lagi 15. februar og 15. august svarandi til rentutilskrivingina pr. 1. januar og 1. juli við at lata Toll- og Skattstovuni uppgerð av inntøkuni og skjalprógvi fyri ognarvinninginum og hvaðani hann stavar. Fer rentutilskriving av ognarvinningi bert fram eina ferð um árið, er freistin at lata uppgerð inn 15. februar aftaná rentutilskrivingina.

Stk. 3. Toll- og Skattstovan skrivar vegna landskassan útrokning uppá fíggjarognaravgjald av ognarvinningi við forfalsdegi til 1. í mánaðinum eftir, at uppgerðin er latin inn við gjaldsfreist til 20. í mánaðinum.

Stk. 4. Verður avgjaldið ikki goldið landskassanum rættstundis, skal rindast 1,5% í mánaðarligari rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá og við forfalsdegnum at rokna.

§ 7. Avgjaldsgrundarlagið fyri tey í § 2, nr. 3 nevndu virðisbrøv fevnir um virðið á øllum virðisbrøvum bæði føroyskum og útlendskum, tó ikki føroyskum partabrøvum sbr. § 2, nr. 3).

Stk. 2. Tá talan er um børsnoterað virðisbrøv, er virðisgrundalagið til útrokning av

skal samtidigt indgive en opgørelse over de opkrævede afgiftsbeløb, bl.a. med oplysning om kontohavernes navne, kontoform og rentesats til Toll- og Skattstovan. Landsstyret kan med bekendtgørelse fastsætte nærmere regler for pengeinstitutternes og postgiros oplysningspligt efter dette stk.

Stk. 5. Betales afgifterne ikke rettidigt til landskassen, skal pågældende pengeinstitut eller postgiro betale 1,5% i månedlig rente for hver påbegyndt måned fra forfaldsdagen at regne.

§ 6. Afgiftsgrundlaget for de i § 2, nr. 2 nævnte formuer omfatter formueafkast på indskydernes konti uanset kontoform.

Stk. 2. Kontohaverne, som der påhviler afgiftspligt i henhold til § 4, har pligt til at opgive den i § 2, nr. 2 nævnte formueafkast til beskatning senest 15. februar og 15. august svarende til rentetilskrivningen pr. 1. januar og 1. juli, ved at indgive opgørelse til Toll- og Skattstovan over indtægten og med dokumentation for formuevæksten og hvorfra denne hidrører. Såfremt rentetilskrivning af formueafkastet kun er en gang om året, er fristen for indgivelse af opgørelse 15. februar efter rentetilskrivningen.

Stk. 3. På landskassens vegne udskriver Toll- og Skattstovan regning for rentafgift af formueafkast med forfaldsdato til 1. i måneden efter, at opgørelsen er sendt ind med betalingsfrist til 20. i måneden.

Stk. 4. Betales afgiften ikke rettidigt til landskassen, skal der betales 1.5% i månedlig rente for hver påbegyndt måned fra forfaldsdagen at regne.

§ 7. Afgiftsgrundlaget for de i § 2, nr. 3) nævnte værdipapirer omfatter værdien på alle værdipapirer både færøske og udenlandske, dog ikke færøske aktier, jfr. § 2, nr. 3).

Stk. 2. Værdien af værdipapirer til brug for udregning af afgiftsgrundlaget for

fíggjarognaravgjaldinum, kursvirðið.
Stk. 3. Tá talan er um virðisbrøv, ið ikki eru børsnoterað, er virðisgrundarlagið til útrokning av fíggjarognaravgjaldinum áljóðandi virðið, um ikki mett verður, at virðið er annarleiðis. Virðisásetingin kann í slíkum førum verða ásett eftir kursvirðisreglum, ið Toll- og Skattstovan ásetur.
Stk. 4. Avgjaldsskyldug lata í síðsta lagi 1. februar Toll- og Skattstovuni uppgerð, ið sýnir avgjaldsgrundarlagið til áseting av fíggjarognaravgjaldinum. Landsstýrið kann við kunngerð seta neyvari reglur fyri slíkum uppgerðum.
Stk. 5. Toll- og Skattstovan skrivar út rokning fyri landskassans krøv uppá fíggjarognaravgjald av virðisbrøvum við forfalsdegi til 1. í mánaðinum eftir, at uppgerðin er latin inn við gjaldsfreist til 20. í mánaðinum.
Stk. 6. Verður avgjaldið ikki goldið landskassanum rættstundis, skal gjaldast 1,5% í mánaðarligari rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá og við forfalsdegnum at rokna.

§ 8. Fíggjarognaravgjaldið fyri ogn sambært § 2, nr. 1 er 2 % p.a. roknað av teim peninganøgdum, sum bera eina og hvørja tilskrivaða bruttorentu, tó í mesta lagi tilskrivaðu rentuna lækkað við 22%.

§ 9. Rentuavgjaldið av ognarvinningi sambært § 2, nr. 2 er 30% av ognarvinninginum.

§ 10. Fíggjarognaravgjaldið fyri ogn sambært § 2, nr. 3 er 2% av virðinum á virðisbrøvunum pr. 31. 12. í hvørjum álmanakkaári uppgjørt sum í § 7, stk 2 og 3 ásett, sbr. tó § 18, stk. 4.

§ 11. Fíggjarognaravgjald og rentuavgjald eftir hesi lóg kann ikki dragast frá í skattskyldugari inntøku.

afgiften af værdipapirer ansættes, for så vidt de er børsnoterede efter kursværdien.

Stk. 3. For så vidt værdipapirerne ikke er børsnoterede, er værdien til brug for udregning af afgiftsgrundlaget for afgiften værdipapirernes pålydende, medmindre det skønnes, at deres værdi er forskellig derfra. Værdiansættelsen kan i disse tilfælde ansættes efter kursværdiregler som Toll- og Skattstovan fastsætter.
Stk. 4. De afgiftspligtige skal senest 1. februar indgive opgørelse til Toll- og Skattstovan, som viser afgiftsgrundlaget for udregning af afgiften. Landsstyret kan med bekendtgørelse fastsætte nærmere regler for opgørelsen.
Stk. 5. På vegne af landskassen udskriver Toll- og Skattstovan regning for formueafgift af værdipapirer med forfaldsdato til 1. i måneden efter at opgørelsen er indsendt og med betalingsfrist til 20. i måneden.
Stk. 6. Betales afgiften ikke rettidigt til landskassen skal der betales 1,5% i månedlig rente for hver påbegyndt måned fra forfaldsdagen at regne.

§ 8. Afgiften på formue i henhold til § 2, nr. 1 er 2% p.a. beregnet af de beløb, der danner basis for en og hver bruttorentetilskrivning, dog højst den tilskrevne rente reduceret med 22 %.

§ 9. Rentealgiften af formueafkast i henhold til § 2, nr. 2 er 30% af formueafkastet.

§ 10. Afgiften for finansielle aktiver i henhold til § 2, nr. 3 er 2% af værdien på værdipapirerne pr. 31.12 i hvert kalenderår opgjort som fastsat i § 7, stk. 2 og 3, jfr. dog § 18, stk. 4.

§ 11. Afgift på finansielle aktiver og renteafgift efter denne lov kan ikke fradrages den skattepligtige indkomst.

§ 12. Toll- og Skattstovan umsitur og innkrevur avgjøld eftir hesi lóg. Toll- og Skattstovan fær í sambandi við umsitingini av lógini somu heimildir til eftirlit og aðrar sømdir sum í skattalógini fyriskrivað fyri skattaeftirlit.

§ 13. Landsstýrið kann við kunngerð áseta nærri reglur um fyrisitingina av hesi lóg.

§ 14. Føroya Gjaldstova kann eftir áheitan frá Toll- og Skattstovuni innheinta við panting fíggjarognar- og rentuavgjald, ið ikki er goldið rættstundis.

§ 15. Við bót verður hann revsaður, sum við vilja ella av grovum ósketni

1) gevur skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella heldur aftur upplýsingar til nýtslu fyri útrokning av avgjaldi eftir hesi lóg ella til avgjaldseftirlitið,
2) ikki letur inn uppgerð so sum fyriskrivað er í § 6 og § 7,
3) ikki avroknar avgjøld til landskassan eftir § 5, stk. 4.

Stk. 2. Tann, sum fremur eitt av nevndu brotum við tilætlan at sleppa undan at gjalda avgjøld til landskassan, verður revsaður við sekt, varðhaldi ella fongsli upp í 2 ár.

Stk. 3. Fyri lógarbrot, ið framd verða av partafeløgum, lutafeløgum ella líkum feløgum kann sektarábyrgd verða áløgd felagnum sum so.

§ 16. Verður mett, at lógarbrotið ikki kemur undir strangari revsing enn sekt, kann Toll- og Skattstova Føroya boða honum, sum hetta viðvíkur, at málið kann verða loyst uttan rættarviðgerð, um so er, at hann viðgongur seg sekan í lógarbrotinum og váttar, at hann innan eina nærri ásetta freist, sum eftir áheitan kann verða longd, vil gjalda eina í fráboðanini tilskilaða sekt.

§ 12. Toll- og Skattstovan administrerer og inddriver afgiften i henhold til denne lov. Toll- og Skattstovan får i forbindelse med administrationen af denne lov samme bemyndigelser til kontrol og andre beføjelse som foreskrevet i henhold til skattelovgivningen.

§ 13. Landsstyret kan med bekendtgørelse fastsætte nærmere regler for gennemførelsen af denne lov.

§ 14. Afgift på finansielle aktiver og renteafgift, som ikke er betalt rettidigt, kan Føroya Gjaldstova efter begæring af Toll- og Skattstovan indrives ved udpantning.

§ 15. Med bøde straffes den, der forsætligt eller groft uagtsomt

1) afgiver urigtige eller vildledende oplysninger eller fortier oplysninger til brug for udregning af afgiften i henhold til denne lov eller for afgiftskontrollen,
2) undlader at indgive opgørelse efter § 6 og § 7,
3) undlader at afregne afgifter til landskassen efter § 5, stk. 4.

Stk. 2. Den, der begår en af de nævnte overtrædelser med forsæt til at unddrage landskassen afgifter, straffes med bøde, hæfte eller fængsel indtil 2 år.

Stk. 3. For overtrædelser, der begås af aktieselskaber, andelsselskaber eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar.

§ 16. Skønnes overtrædelsen ikke at ville medføre højere straf end bøde, kan Toll- og Skattstovan tilkendegive den pågældende, at sagen kan afgøres uden retslig forfølgning, såfremt denne erkender sig skyldig i overtrædelsen og erklærer sig rede til inden for en nærmere angiven frist, der efter begæring kan forlænges, at betale en i tilkendegivelsen angivet bøde.

Stk. 2. Med hensyn til den i stk. 1 nævnte

Stk. 2. Viðvíkjandi teimum í stk. 1 umrøddu fráboðanum, verða reglurnar í rættargangslóglini um innihaldið í ákæruritum í politimálum samsvarandi galdandi.
Stk. 3. Verður sektarpeningurin goldin rættstundis, ella verður sektin sambært góðkenning innheintað ella verður á annan hátt liðið revsing fyri hana, fellur málið burtur.

§ 17. Tá mál um brot á hesar reglur verða løgd fyri rættin, verða tey viðgjørd sum Løgreglumál. Rættarráðini í rættargangslógini kapitul 72 og 73 kunnu nýtast í sama mun sum í málum, sum sambært vanligu reglunum áliggja ríkisadvokatinum at fremja.

§ 18. Hendan løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. Fíggjarognaravgjaldið eftir § 8 verður galdandi fyri innistandandi fevnt av § 2, nr. 1), ið er útrokningargrundarlag fyri rentutilskrivingar frá og við 19. oktober 1993 og til og við 31. desember 1994.
Stk. 3. Rentuavgjaldið eftir § 9 verður galdandi fyri ognarvinning fevndur av § 2, nr. 2), og sum verður tilskrivaður kontohavara frá og við 19. oktober 1993 og til og við 31. desember 1994.
Stk. 4. Fíggjarognaravgjaldsskyldan eftir § 10 av virðisbrøvum fevnd av § 2, nr. 3 verður í 1993 galdandi við 1% í mun til virðið á virðisbrøvunum pr. 31.12.1993 og í 1994 við 2% í mun til virðið pr. 31.12.1994.

tilkendegivelse finder bestemmelserne i retsplejeloven om indhold af anklageskrift i politisager tilsvarende anvendelse.
Stk. 3. Betales bøden i rette tid, eller bliver den efter vedtagelse inddrevet eller afsonet, bortfalder videre forfølgning.

§ 17. Når sager om overtrædelse af disse regler indbringes for domstolene, behandles de som politisager. Retsmidlerne i retsplejelovens kapitel 72 og 73 kan anvendes i samme omfang som i statsadvokatsager.

§ 18. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelse.
Stk. 2. Afgiften på finansielle aktiver efter § 8 har virkning for indestående omfattet af § 2, nr. 1), som er udregningsgrundlaget for enhver rentetilskrivning fra og med 19. oktober 1993 og til og med 31. desember 1994.
Stk. 3. Renteafgiften efter § 9 har virkning for formueafkast omfattet af § 2, nr. 2) og som bliver tilskrevet kontohaverne fra og med 19. oktober 1993 og til og med 31. desember 1994.
Stk. 4. For værdipapirer omfattet af § 2, nr. 3 indtræder afgiftspligten efter § 10 med 1% i 1993 i forhold til værdien på værdipapirer pr. 31.12.1993 og med 2% i 1994 i forhold til værdien pr. 31.12.1994.

Viðmerkingar:
Tá fíggjarlógaruppskotið fyri 1994 var lagt fyri tingið 31. august í ár, var undirskotið mett til 248 mió. kr.

Hallið verður nú, í seinnu helvt av oktober mánaði mett til 539 mió. kr. Inntøkumetingarnar eru lækkaðar við uml. 95 mió. kr., veðhaldsútreiðslurnar til almennar grunnar eru mettar 30 mió. kr. hægri og rentuútreiðslurnar eru mettar 166 mió. kr. hægri, harav uml. 100 mió. kr. í rentum av lántøkuni til nýggjan eginpening til bankarnar og 66 mió. kr. í kurstapi av uttanlandsláni, sum skal endurfíggjast í 1994.

Sambært avtaluni millum Donsku Ríkisstjórnina og Føroya Landsstýri frá 12. oktober 1993 hevur landsstýrið bundið seg til at minka hallið á fíggjarlógaruppskotinum við 250 millj. kr.

Hetta kann gerast við at hækka inntøkurnar ella at minka útreiðslurnar.

Landsstýrið metir tað ikki tað verða skilagott í hesum døgum við so stórum arbeiðsloysi at tátta meira í á fíggjarlógini enn hægst neyðugt, tí tað kann ikki annað enn hava uppaftur størri arbeiðsloysi við sær.

Tí verður neyðugt - umframt at skerja útreiðslurnar á fíggjarlógaruppskotinum - eisini at økja inntøkur landskassans.

Landsstýrið leggur tí hetta uppskot fyri Løgtingið um kreppuskatt á øli fíggjaraktiv, bæði innistandandi í føroyskum og útlendskum peningastovnum og á virðisbrøv, tó ikki føroysk partabrøv.

Ætlanin við uppskotinum er at taka 1 prosent av rentuberandi upphæddini á rentutilskrivingini 31.desember 1993, 30. juni og 31. desember 1994. Avgjaldið kann tó ongantíð fara upp um rentutilskrivingina.

Hetta er ein fyribilsskipan, og henda lóg verður tí bert í gildi til 31. desember 1994. Talan er um at taka part av ognarvinningi, tvs. rentum, men ikki at skerja sjálva ognina.

Peningastovnarnir høvdu tann 30. august 1993 innistandandi góðar 9,9 mia. kr. tilsamans. Ogn hjá landi, kommunum og almennum stovnum er ikki roknað upp í avgjaldsskyldugu fíggjarognina. Skattskylduga fíggjarognin soleiðis roknað er 8,6 mia. kr. Av hesum kann fult gjald bert roknast av langtíðar innlánum, tí stuttfreistað innlán hava so lágt rentustig, at tilskrivaða rentan í nógvum førum verður minni enn 2 prosent p.a. av fíggjarognini.

Í meðal kann roknast við, at umleið 70 prosent av innlánunum í peningastovnunum eru langtíðar innlán og 30 prosent eru stuttfreistað innlán.

Inntøka landskassans verður sostatt umleið 70 mió. kr. fyri hvørja rentutilskriving ella umleið 210 mió. kr. tilsamans í tíðarskeiðinum frá framløgudegnum til 31. desember 1994. Haraftrat kemur ein miuni upphædd fyri avgjald á fíggjarogn uttanlands.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar.

Til § 1.
Í hesum uppskoti verður mælt til at leggja avgjald til landskassan á rentuinntøku og á fíggjarogn.

Til § 2.
Avgjaldið skal rindast av

1. ogn, ið er innistandandi í føroyskum peningastovnum og postgiro.
2. rentu av peningi innistandandi í útlendskum peningastovnum og
3. virðinum av virðisbrøvum, tó ikki av partabrøvum v.m., sum eru skrásett í Føroyum sbr. § 1, nr. 8) í skattalógini.

Í § 5 er tilskilað, at av innistandandi í føroyskum peningastovnum og postgiro, eru konti fyri bundnari uppsparing og klientkonto ikki umfataðar av avgjaldsskylduni.

Í § 6 er tilskilað, at avgjaldið skal rindast av rentu av konti í útlendskum peningastovnum, uttan mun til, hvat slag av konti talan er um.

Í § 7 eru ásettar reglur fyri, hvussu virðið av virðisbrøvum skal ásetast, og hvørja heimild Toll- og Skattstovan hevur til at gera reglur fyri hvussu kursvirðið skal ásetast.

Til § 3.

Í hesi grein eru nevnd undantøkini fyri avgjaldsskyldu, og eru hesi

1) persónar, sum búgva uttan fyri Føroyar, og ikki eru umfataðir av § 1 ella § 2 í skattalógini, t.v.s., ikki eru fult ella avmarkað skattskyldugir í Føroyum.
2) Útlendsk feløg og felagsskapir, ið ikki koma undir skattskyldu.

Verður í hesum báðum førum sannað, at fulla skattskyldan skal staðfestast affurvirkandi, verður avgjaldsskyldan at galda frá sama degi, sum fulla skattskyldan skuldi verið staðfest. Annars eru undantøkini:

3. landskassi Føroya.
4. stovnanir, har inntøkur og útreiðslur eru fyriskipaðar í fíggjarlógum hjá danska ríkinum ella løgtinginum, og virki og stovnar, sum løgtingið eigur, og sum verða riknir fyri landskassans rokning.
5. kommunur,
6. virki og stovnar, sum kommununar eiga, og sum verða rikin fyri kommunanna rokning og
7. Tjóðbanki Danmarkar.

Hesir persónar, feløg og stovnarnir eru sostatt tey einastu, sum samb. lógini eru undantikin avgjaldsskyldu.

Til § 4.

Í hesi grein verður avgjaldskyldan samb. § 2, nr. 2) og 3) lýst neyvari, tá her verður sagt, at henda liggur á øllum, sum eru ásett at vera skattgjaldarar, ið hava fulla skattskyldu og skattligan heimstað í Føroyum samb. § 1 í skattalógini.

Í 2. stk. í hesi grein verður síðani sagt, at avgjaldsskyldan samb. § 2 nr. 2) og 3) eisini fevnir um niðanfyri nevndu stovnar:

1. føroyskir sparikassar,
2. Tryggingarsambandið Føroyar og allar deildir tess,
3. fleggingargrunnin fyri Føroyar,
4. Menningargrunn Ídnaðarins,
5. Føroya Ídnaðargrunnur,
6. Færøernes Realkreditinstitut og
7. Fíggingargrunnin fyri 1992.

Til § 5.

Viðmerkingar til 1. stk. í hesi grein eru tiknar við undir viðmerkingunum til § 2.

Annars verður í hesi grein sagt, at kontohavarin, sum eigur ogn, sum nevnd er í § 2, nr. 1),

t.v.s. inniogn í føroyskum peningastovnum og postgiro. sjálvur ber avgjaldið. men skal peningastovnurin ella postgiro. hansara vegna, rinda hetta beinleiðis í landskasan. Avgjaldið skal rindast burturav tilskrivaðu rentuni á tí konto. sum avgjaldið viðvíkir. aftaná at rentuskattur er goldin av rentu á somu konto samb. galdandi rentuskattalóg. Við øðrum orðum. so skal burturav tilskrivaðu rentuni fyrst rindast rentuskatur eftir galdandi rentuskattalóg, og síðani avgjald samb. hesa lóg.

Síðani eru ásettar reglur fyri hvussu avgjaldið skal avroknast Toll- og Skattstovuni. og hvørjar upplýsingar peningastovnar og postgiro skulu lata Toll- og Skattstovuni í samb. við hesa avrokning.

Peningastovnar og postgiro skulu í seinasta lagi 15. í mánaðinum aftaná, at renta er tilskrivað á hvørja konto avrokna avgjaldið til landkassan saman við yvirliti yvir kravdu gjøldini og nøvnum á kontohavarum. kontoslag og rentustigi.

Eisini er her fingin landsstýrinum heimild til at áseta neyvari reglur fyri upplýsingarskylduni hjá peningastovnunum og postgiro mótvegis Toll- og Skattstovuni.

At enda í hesi grein verður sagt. at um peningastovnarnir og postgiro ikki rinda avgjøldini rættstundis. sum ásett í 4. stk. í hesi grein. so skulu hesir rinda 1.5% í mánaðarligari rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá forfalsdegnum at rokna.

Til § 6.
Viðmerkingar til 1. stk. í hesi grein eru tiknar við undir viðmerkingunum til § 2.

Viðari í hesi grein er síðani ásett, hvussu kontohavarar, sum eru undir avgjaldsskyldu samb. § 4 skulu geva upp til skattingar, tann ognarvinning, sum nevndur er í § 2, nr. 2), nevniliga rentu av innistandandi í útlendskum peningastovnum. Hesir skulu í seinasta lagi hin 15. februar og 15. august, svarandi til rentutilskrivingina pr. 1. januar og 1. juli senda Toll- og Skattstovuni uppgerð av innløkuni, og skjalprógv fyri ognarvinningin og hvaðani hann stavar. Fer rentutilskrivingin fram bert eina ferð um árið, skal uppgerðin latast inn í seinasta lagi 15. februar í árinum aftaná rentutilskrivingina. Toll- og Skattstovan skrivar síðani út rokning uppá avgjaldið. og fellur hetta til gjaldingar tann 1. í mánaðinum eftir, at uppgerðin er innlatin. og er gjaldsfreistin sett til 20. í mánaðinum. Verður goldið ov seint, skal rindast 1.5% í mánaðarligari rentu fyri hvønn mánað frá forfalsdegnum at rokna.

Til § 7.
Tá talan er um avgjald av virðisbrøvum, sum nevnd í § 2, nr. 3), so fevnir avgjaldsskyldan ikki um føroysk partabrøv. Sí viðmerking til § 2.

Útlendsk virðisbrøv kunnu býtast upp í
1. børsnoterað virðisbrøv og
2. ikki børsnoterað virðisbrøv.

Tá talan er um børsnoteraði virðisbrøv, so er virðisgrundarlagið fyri avgjaldið kursvirðið.

Neyvari reglur verða settar hesum viðvíkjandi.

Snýr tað seg um ikki børsnoteraði virðisbrøv, er virðisgrundarlagið til útrokning av

avgjaldinum navnvirðið. Virðisásetingin kann tó, um virðið verður mett ørðvísi enn navnvirðið, ásetast eftir kursvirðisreglum, sum Toll- og Skattstovan ásetur, og kemur kurslistin frá Told- & Skattestyrelsen í Danmark at verða nýttur fyri donsk virðisbrøv.

Tey, sum soleiðis eru avgjaldsskyldug skulu í seinasta lagi 1. februar senda Toll- og Skattstovuni uppgerð, har avgjaldsgrundarlagið til áseting av fíggjarognaravgjaldinum er tilskilað. Landsstýrinum er heimilað at seta neyvari reglur fyri slíkum uppgerðum.

Toll- og Skattstovan skrivar síðani út rokning fyri landskassans krøv uppá avgjaldið, og fellur hetta til gjaldingar tann 1. í mánaðinum eftir, at uppgerðin er latin inn, og er gjaldsfreist til hin 20. í sama mánaði. Ov sein gjalding førir við sær, at renta verður roknað við 1,5% um mánaðin frá forfalsdegnum at rokna.

Til § 8.

Fíggjarognaravgjaldið av ogn, sum er nevnd í § 2, nr. 1), t.v.s. innistandandi í føroyskum peningastovnum og postgiro, er 2% p.a.

Avgjaldið verður roknað av teimum peningaupphæddum, sum bera eina og hvørja tilskrivaða bruttorentu. Avgjaldið kann tó ongantíð verða størri enn tann tilskrivaða rentan minkað við 22%, sum er rentuskatturin samb. galdandi rentuskattalóg.

Til § 9.

Avgjaldið av rentu í útlendskum peningastovnum, sum er nevnd í § 2, nr. 2), er 30% av tilskrivaðu rentuni.

Til § 10.

Fíggjarognaravgjaldið av ogn, sum er nevnd í § 2, nr. 3, t.v.s. virðisbrøvum, burtursæð frá partabrøvum í føroyskum partafelǿgum, er sett til 2%. Virðisgrundarlagið fyri avgjaldinum verður gjørt upp pr. 31.12. í hvørjum álmanakkaári soleiðis sum tilskilað er í § 7, 2. stk.

Til § 11.

Fíggjarognaravgjøld og tey rentuavgjøld, sum rindast skulu eftir hesi lóg, kunnu ikki dragast frá í skattskyldugu inntøkuni.

Til § 12.

Her er ásett, at Toll- og Skattstovan umsitur og krevur inn avgjøld samb. hesi lóg. Til tess at lúka umsitingina av hesi lóg fær Toll- og Skattstovan somu heimildir til eftirlits, sum ásettar eru fyri skattaeftirliti.

Til § 13.

Her er fingin landsstýrinum heimild til við kunngerð at áseta nærri reglur um fyrisiting av lógini.

Til § 14.

Har fíggjarognaravgjaldið og rentuavgjaldið er ikki rættstundis goldið, kann Føroya Gjaldstova, eftir áheitan frá Toll- og Skattstovuni, innheinta hetta við panting.

Til § 15.

Henda grein ásetur reglar um revsing fyri ikki at gera eftir reglunum í lógini.

Bót er ásett fyri at

- geva skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella halda aftur upplýsingar, ið skulu nýtast til at rokna avgjaldið eftir ella í samb. við eftirlit,
- lata verða við at senda inn uppgerð samb. ásetanunum í §§ 6 & 7,
- lata verða við at avrokna avgjøld til landskassan, soleiðis sum ásett er í § 5, stk. 4.

Verður slíkt brot framt við tí í hyggju, tilætlað at sleppa sær undan at rinda avgjøld til landskassan, kann revsingin verða sekt, varðhald ella fongsul upp í 2 ár.
Har brot verður framt av partafeløgum, lutafeløgum ella tílíkum feløgum, kann sektarábyrgdin verða løgd á felagið sum so.

Til § 16.
Henda grein er framhald av § 15, og verður her sagt, at gevur lógarbrotið ikki strangari revsing enn sekt, kann Toll- og Skattstovan mæla til, at málið verður avgreitt uttan rættarviðgerð, treytað av at tann sum framt hevur lógarbrotið viðgongur seg sekan og játtar at rinda eina av Toll- og Skattstovuni ásetta sekt.

Til § 17.
Her verður sagt, at verða mál um brot á reglurnar í lógini løgd fyri rættin, skulu tey viðgerast sum løgreglumál.

Til § 18.
Henda lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.
Fíggjarognaravgjaldið av ogn samb. § 2, nr. 1) t.v.s. innistandandi í føroyskum peningastovnum og postgiro er galdandi fyri rentutilskrivingar frá og við 19. oktober 1993 og til og við 31.12.1994. Avgjaldsskyldan fyrstu ferð skal fevna um tær peninganøgdir, sum bera eina og hvørja rentu í tíðarskeiðinum frá seinastu rentutilskriving undan 19. oktober 1993 til renta fyrstu ferð verður tilskrivað 19. oktober ella seinri.

Rentuavgjaldið av ognarvinningi av ogn, sum er nevnd í § 2, nr. 2), t.v.s. innistandandi í útlendskum peningastovnum, skal fyrstu ferð roknast av teimum rentum, sum verða tilskrivaðar nevndu konti 19. oktober 1993 ella seinri fyri tíðarskeiðið frá seinastu rentutilskriving, sjálvt um henda er hend áðrenn 19. oktober 1993.

Avgjaldsskyldan av virðinum av virðisbrøvum verður í 1993 galdandi við 1% í mun til virðið pr. 31.12.1993 og í 1994 við 2% í mun til virðið pr. 31.12.1994. Nevnda virði skal gerast upp eftir reglunum í § 7.

1. viðgerð 27. oktober 1993. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. november 1993 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 19. oktober 1993 og eftir 1. viðgerð 27. oktober 1993 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við Toll- og Skattstovu Føroya, P/F Føroya Banka, P/F Sjóvinnubankan, Tryggingarsambandið Føroyar og Føroya Íðnaðarfelag.

Eisini hevur nevndin havt fund við Finnboga Ísakson, landsstýrismann.

Talan er um eitt kreppulógaruppskot, sum hevur til endamáls at útvega landskassanum meirinntøkur, og er uppskotið tíðaravmarkað til 31. december 1994.

Orsøkin til hetta er tann, at landsstýrið hevur bundið seg til at gera fíggjarlógarábøtur fyri í alt 250 mió. kr.

Hetta skal gerast á henda hátt:

a) inntøkulógir fyri 1993
b) inntøkulógir fyri 1994
c) sparingar á fíggjarløgtingslógini fyri 1994

Landsstýrið metir tað ikki verða skilagott í hesum døgum við so stórum arbeiðsloysi at tátta meira í á fíggjarlógini enn hægst neyðugt, tí tað kann ikki annað enn hava uppaftur større arbeiðsloysi við sær.

Tí verður neyðugt - umframt at skerja útreiðslurnar á fíggjarlógaruppskotinum - eisini at økja inntøkur landskassans.

Landsstýrið hevur upplýst, at ætlanin er at skerja útreiðslurnar á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1994 við umleið 100 mió. kr., og at hesar skerjingar skulu halda fram í komandi árum, inntil rakstrarútreiðslur landskassans koma niður á umleið 1,8 mia. kr. til 2 mia. kr., sum er tað støðið, sum landskassin er førur fyri at bera, sæð í mun til inntøkustøði landskassans.

Í mun til uppskot landsstýrisins er nú talan um at lækka avgjaldssatsirnar av ogn, ið er innistandandi á konto í føroyskum peningastovnum og postgiro frá tí í uppskotinum setta 2% p.a. til at vera 1,7% p.a. ella 0,85% við hvørja rentutilskriving.

Harumframt verður skotið upp at seta inn avmarking í avgjaldinum, ið skal vera, at tað altíð skal vera í minsta lagi 1/8 eftir av tilskrivaðu rentuni, eftir at bæði rentuskattur og fíggjarognaravgjald eru frátrekt bruttorentuni. Avgjaldssatsurin á ognarvinningi av ogn, ið er innistandandi á konti í útlendskum peningastovnum verður lækkaður frá 30% til 25% og avgjaldið á virðisbrøvum verður sett til 1,7%.

Nevndu broytingar verða mettar at minka um ætlaðu meirinntøkur landskassans við 30 mió. kr. Tað vil siga, at skipanin, ið var mett til at geva 210 mió. kr. í meirinntøku við 70 mió. kr. í seinna hálvár 1993 og 70 mió. kr. fyri hvørt av hálvárunum 1994, nú í staðin verður av landsstýrinum mett at geva umleið 180 mió. kr.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Finnbogi Ísakson, hevur harumframt skotið upp, at kontiundantøkini í § 5 verða minkað til bert at fevna um konti fyri bundnari uppsparing, t.v.s., at klientkonti nú eisini verða fevndar av avgjaldskylduni.

Hann skjýtur eisini upp, at í § 3 skulu aðrir almennir grunnar so sum Húsalánsgrunnurin, Búagrunnurin, Menningargrunnur Ídnaðarins og Føroya Ídnaðargrunnur verða frítiknir fyri avgjøld eftir hesi lóg eins og føroyska arbeiðsloysisskipanin og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin skulu verða tað.

Eisini er biðið um, at hædd verður tikin fyri teimum avtalaðu skipasmiðjuprojektum, har fíggingin meira ella minni er tengd at, hvør rentuskattaskipan er galdandi.

Skriv er komið frá Føroya Lívstrygging, har teir við ávísing á minkandi bonus til kundarnar vísa á, at teir ikki meta, at grundarlag er fyri, at Føroya Lívstrygging skal verða fevnd av avgjaldsskyldunum. Teir vísa eisini á økta vandan fyri, at landskassaveðhaldið teirra vegna harvið verður effektivt. Eisini gera teir vart við, at Føroya Lívstrygging ikki kann metast sum partur av Tryggingarsambandinum Føroyar. Hvat viðvíkur spurninginum, um ognirnar hjá lívstryggingini koma undir avgjaldsskyldu, er at siga, at hesin spurningur varð viðgjørdur í landsstýrinum, áðrenn lógaruppskotið varð framlagt, og var niðurstøðan, at tá rentutilskrivingar á eftirlønarskipanum í peningastovni koma undir avgjaldsskyldu, er eisini neyðugt, at ognirnar hjá lívstryggingini koma undir somu skyldur, fyri ikki at skapa ójavna millum peningastovnsskipanirnar og tær í lívstryggingini. Skrivið frá lívstryggingini broytir ikki hesa støðu, men ásannast má, at í sambandi við tilevning av lógaruppskotinum, hevur ikki verið tikið hædd fyri, um lívstryggingin kann metast sum partur av Tryggingarsambandinum ella ei. Skal avgjaldsskyldan fasthaldast fult út fyri Føroya Lívstrygging so sum í uppskotinum ætlað, so er neyðugt við ávísum neyvari orðingum.

Hinar broytingarnar eru meir tekniskar og eru fyri ein part umorðingar og fyri annan part neyvari útgreinanir.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Lasse Klein, Eyðálvur Dimon og Heini O. Heinesen) mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við omanfyri nevndu broytingum og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

<u>uppskot landsstýrisins</u>

1) § 2, nr. 3 verður orðað soleiðis
"virðisbrøv, tó ikki partabrøv í partafeløgum v.m. skrásett í Føroyum sbr. § 1, nr. 8 í skattalógini og pantibrøv, ið eru ogn hjá føroyskum fíggingarstovnum, og sum geva veð í fastari ogn."

2) § 3, nr. 1 verður orðað soleiðis:
"persónar, sum ikki hava bústað í Føroyum ella ikki eru fevndir av § 1

1) § 2, nr. 3 affattes således:
"Værdipapirer, dog ikke aktier i aktieselskaber m.v. indregistrerede på Færøerne jfr. § 1 nr. 8 i skatteloven og pantebreve, der ejes af færøske financieringsinstitutter, og giver pant i fast ejendom."

2) § 3, nr. 1 affattes således:
"personer, som ikke har bopæl på Færøerne, eller som ikke er under

ella § 2 í skattalógini."

3) Í § 3. verður sum nr. 10), 11) og 12) sett:
"10) Arbeiðsloysisskipanin
11) Arbeiðsmarknaðar-eftirlønargrunnurin
12) Aðrir almennir grunnar, ið eru skipaðir við løgtingslóg sbr. eisini pkt. 5)".

4) Í § 4, stk. 2 verður orðingin "Menningargrunnur Ídnaðarins, Føroya Ídnaðargrunnur" strikað. Aftaná orðingina "allar deildir tess" verður sum ískoyti sett "Føroya Lívstrygging".

5) Í § 5, stk. 1, verður nr. 2 strikað.

6) § 8 verður orðað soleiðis:
"Fíggjarognaravgjaldið fyri ogn sambært § 2, nr. 1, er 1,7% p.a. roknað av teim peninganøgdum, sum bera eina og hvørja tilskrivaða bruttorentu, tó hægst 7/8 av tí tilskrivaðu nettorentuni. Nettorentan merkir her tilskrivað bruttorenta, lækkað við 22%."

7) Í § 9. verður "30%" broytt til "25%".

8) § 10 verður orðað soleiðis:
"Fíggjarognaravgjaldið fyri ogn sambært § 2, nr. 3, er 1,7% av virðinum á virðisbrøvum pr. 31.12 í hvørjum álmanakkaári, tá virðisbrøvini eru ogn pr. 31.12. og hava verið ogn hins avgjaldsskylduga alt árið. Um virðisbrøvini bert hava verið ogn hjá tí avgjaldsskylduga ein part av árinum, verður avgjaldið upp á 1,7% at minka lutfalsliga svarandi til lutfallið millum ognartíðina og álmanakkaárið. Tað sama er galdandi, tá talan er um sølu í árinum. Avgjaldið verður tá goldið av virðinum við sølu og í lutfalli, sum ásett í pkt. 2. Virðið verður uppgjørt sum í § 7, stk. 2 og 3 ásett, sbr. tó § 18, stk. 4."

9) Í § 14 verður sum stk. 2 sett:
"Avgjøldini eftir stk. 1 kunnu verða

skattepligt efter § 1 eller § 2 i skatteloven."

3) I § 3. indsættes som nr. 10), 11), og 12):
"10) Arbeiðsloyisisskipanin
11) Arbeiðsmarknaðar-eftirlønargrunnurin
12) andre offentlige fonde, som er foreskrevet ved lagtingslov, jfr. desuden pkt. 5)".

4) I § 4 stk. 2 udgår "Menningargrunnur Ídnaðarins, Føroya Ídnaðargrunnur". Efter ordene "alle dets afdelinger" tilføjes "Føroya Lívstrygging".

5) I § 5 stk. 1 udgår nr. 2.

6) § 8 affattes således: "Afgiften på formue i henhold til § 2 nr. 1 er 1,7% p.a. beregnet af de kapitalbeløb, der danner basis for en og hver bruttorentetilskrivning, dog højst 7/8 af den tilskrevne nettorente. Nettorenten er her den tilskrevne bruttorente reduceret med 22%."

7) I § 9 ændres "30%" til "25%".

8) § 10 affattes således: "Afgiften på financielle aktiver i henhold til § 2 nr. 3 er 1,7% af værdien på værdipapirerne pr. 31.12 i hvert kalenderår, såfremt værdipapirerne er ejendom pr. 31.12 og har været det hele kalenderåret. Såfremt værdipapirerne kun har været den afgiftspligtiges ejendom en del af året reduceres afgiften på 1,7% forholdsmæssigt svarende til forholdet mellem ejendomsperioden i kalenderåret og kalenderåret. Det samme er gældende såfremt værdipapirer sælges i året. Afgiften bliver da betalt af værdien ved salg og forholdsmæssigt reduceret som i pkt. 2 fastsat. Værdien bliver opgjort som fastsat i § 7 stk. 2 og 3 jfr. dog § 18 stk. 4."

9) I § 14 indsættes som stk. 2:
"De i stk. 1 nævnte afgifter kan inddrives ved indeholdelse i den

innheintað við eftirhaldi í A-inntøkuni hjá viðkomandi sambært reglunum í skattalógini um innheinting av skatti."

10) Í § 18, stk. 4 verður orðað soleiðis: Fíggjarognaravgjaldsskyldan eftir § 10 av virðisbrøvum fevnd av § 2, nr. 3 verður í 1993 galdandi við 0,5% í mun til virðið á virðisbrøvunum pr. 31.12.1993 ella við sølu og keyp aftan á 19. oktober 1993 við 0,5% jfr. § 10, pkt. 2 - 4, í 1994 við 1,7% í mun til virðið pr. 31.12.1994 ella við keyp og sølu í 1994 1,7% jfr. § 10, pkt. 2 - 4".

11) Í § 18 verður sum stk. 5 sett:
"Innistandandi á konti í Føroyum, ið hevur samband við gjørdar avtalur um bygging á føroyskum skipasmiðjum í áliti til óbroyttar fortreytir, verða ikki fevndar av hesi lóg, og verða framhaldandi skattaðar sambært princippinum og procentsatsinum í reglunum í løgtingslóg nr. 4 frá 26. mars 1953 um inntøkuskatt av rentum av innistandandi peningi í føroyskum bankum og sparikassum."

pågældendes A-indkomst efter skattelovens regler for inddrivelse af skat."

10) I § 18 affattes stk. 4 således:
"For værdipapirer omfattet af § 2 nr. 3 indtræder afgiftspligten efter § 10 med 0,5% i 1993 i forhold til værdien på værdipapirer pr. 31.12.1993 eller ved køb og salg efter 19. oktober 1993 med 0,5% jvf. § 10 pkt. 2-4, i 1994 med 1,7% i forhold til værdien pr. 31.12.1994 og ved køb eller salg i 1994 1,7% jfr. § 10 pkt. 2-4."

11) I § 18 indsættes som stk. 5:
"Indestående på konti på Færøerne, der har forbindelse med indgående aftaler om bygning på færøske skibsværfter, der er indgået i tillid til uændrede forudsætninger, omfattes ikke af denne lov og skal fremover beskattes i henhold til principperne og procentsatserne i lagtingslov nr. 4 af 26. marts 1953 om indtægtsskat af renter af indestående i færøske pengeinstitutter og sparekasser."

Minnilutin (Jógvan Sundstein) hevur hesar meiri almennu viðmerkingar til inntøkulógaruppskot landsstýrisins í sambandi við minking av hallinum á fíggjarlógaruppskotinum 1994 (Stytri viðmerkingar verða til hvørt uppskotið sær).

Sambært avtalu frá 12. oktober 1993 millum Føroya Landsstýri og donsku stjórnina skal gjøgnumførast ein sokallað "budgetforbedring" upp á 250 mió. kr. Tað vil siga, at fyrst skal fíggjarlógaruppskotið fyri 1994 endurskoðast, og tað økir eftir øllum at døma hallið til umleið 550 mió. kr. Síðani skulu av hesum hallinum skarvast 250 mió. kr., antin við útreiðslulækkingum ella við inntøkuhækkingum.

Skattahækkingar eru royndar m.a. við útskriving av eykaskatti seinastu 2 - 3 árini, men kortini er skattainntøkan til landskassan minkað. Eisini er kommunuskatturin nógv øktur seinastu árini, og aftur í 1994 verður nú við lóg álagt kommununum at hækka kommunuskattin. Harafturat kemur gjald til arbeiðsloysistryggingina, sum nú er 2,75% fyri bæði løntakaran og arbeiðsgevaran. Talan kann tí ikki verða um at hækka beinleiðis pensónsskattin. Minnilutin kann tí ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins um hægri eykaskatt. Hægri skattur ger bert búskaparligu støðuna nógv verri. Landsstýrisins uppskot eigur tí at falla

soleiðis, at eisini núverandi eykaskattur fer úr gildi.

Í løgtingsmálunum nr. 125 og 126/92 legði táverandi landsstýri fram uppskot um broyting í skattastiganum fyri landsskatt soleiðis, at yvir eitt ávíst áramál lækkaði skatturin samstundis, sum botnfrádrátturin hækkaði, og privati rentufrádrátturin lækkaði. Hetta uppskotið hevði ført við sær betri viðurskifti fyri bæði skattaborgaran og vinnulívið og hevði samstundis tikið burtur sum fráleið fyrimunin við lántøku. Tíverri tók nýggja samgongan uppskotið av borðinum, men tað eigur at verða lagt fram aftur.

Uppskotið um fíggjaravgjald er oyðandi fyri føroyska uppsparing og harvið bæði fyri vanliga borgaran, vinnulívið og fyri fíggjarsektorin. Tað er møguligt, at hetta kann geva landskassanum nakað av peningi í fyrsta umfari, men áðrenn 1994 er farið, er samfelagið drenað fyri kapital, tað vil siga, at uppaftur minni enn nú verður til fígging av vinnuligum virksemi, eins og skipanin forðar fyri eini møguligari rentulækking. Hartaftrat kann ein slík lóg ávirka uppaftur fleiri til at flyta av landinum.

Tað, okkum tørvar, eru loysnir, sum geva vinnuni og harvið framleiðsluni betri møgulcikar. Tí er neyðugt frá fólkafloksins síðu at endurtaka nakrar av komponentunum í hesum loysnum, sum roynt hevur verið at fingið gjøgnumført, men tíverri enn við ov lítlari undirtøku.

At skattalækking er ein vegur, vísir seg tí, at sjálvt í hesum tíðum er partafelagsskattainntøkan økt við einum lægri skattaprosenti.

Nøkur av tiltøkunum, sum fremjast mugu, eru tí hesi:

1. Nýggjar samráðingar verða við donsku stjórnina - ikki um fleiri lán men um, hvussu tey nú upptiknu og lovaðu lánini verða afturgoldin og rentað.

2. Í hesum sambandi verður avtala gjørd um blokkstuðulin, hvussu hann heilt ella partvís verður nýttur at rinda rentur og avdrátt við.

3) Fíggjarlógin verður tillagað føroyska vinnulívs- og búskaparmynstrinum bæði viðvíkjandi útreiðslum og inntøkum.

4) Hetta gerst fyrst og fremst við, at lønarstøðið verður lækkað og harvið eisini annar kostnaður í samfelagnum.

5) Skattatrýstið verður lækkað samsvarandi lønarlækkingunum.

6) Við longri framtíðaratliti verður skatturin lækkaður eins og rentufrádrátturin lækkar vísandi til løgtingsmál nr. 125 og 126/1992.

7) Rentuskatturin skal ikki hækka, men tá rentufrádrátturin kemur niður á núverandi støði fyri rentuskatt, skulu rentufrádráttur og rentuinntøkuskattur fylgjast niðureftir.

8) Partafelagsskatturin má haldast á núverandi lága støði og møguliga í framtíðini lækka upp aftur meira.

9) Handilssáttmálin við ES skal yvirhaldast og kvotur fyri føroyskan útflutning hækkast samsvarandi útflutningstølunum.

10) Við lækkandi kostnaðarstøði og lækkandi almennari nýtslu verða fleiri vinnuligir møguleikar, og tí eiga at vera - og koma eisini at vera - fleiri fíggingarmøguleikar til vinnuligt virksemi.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) kann tí ikki geva tilsøgn um undirtøku til landsstýrisins uppskot um hækking av skatti og gjøldum. Í onkrum førum verður tikið undir við uppskotum um broytingar av tekniskum slagi. Hetta verður greitt frá í viðmerkingum til hvørt uppskotið sær.

Landsstýrið skal leggja fram uppskot um sparingar á fíggjarlógini. Tá ið samlaða "betranin" skal vera 250 mió. kr., eigur so gott sum øll henda upphæddin at koma við í spariuppskotinum. Enn er einki broytingaruppskot komið frá landsstýrinum, og er tað tí óðamannaverk av samgonguni at gjøgnumføra skattahækkingar nú. Hetta førir bert til meiri arbeiðsloysi, sparingar høvdu ikki havt somu ávirkan. Um fram verður farið eftir fólkafloksins uppskoti, kemur meiri virksemi burturúr.

Minnilutin (Finnbogi Arge) førir fram:
Fíggjarognaravgjaldið er fyrsta stigið á leiðini fram til ognarskatt, sum ongantíð áður hevur átt politiskan meiriluta aftan fyri seg á Føroya løgtingi.

Í fyrstu syftu er ætlanin at leggja avgjald á øll sløg av peningakonti hjá borgarunum, eisini hjá borgarum, ið skylda meira burtur, enn teir eiga. Av somu orsøk ber til at siga, at fíggjarognargjaldið í roynd og veru raktar harðari enn reinur ognarskattur. Hóast tú onga nettoogn eigur, tá skuldin er mótroknað, skalt tú kortini gjalda skatt, sum um talan var um reella ogn.

Nógv eru í tí støðu, at tey ikki sleppa at cleara innistandandi í veð fyri virki ella næstringar. Hesi verða nú revsað og koma illa fyri av lógini, meðan tey, sum sleppa at cleara, ikki verða ávirkað skattliga av lógaruppskoti landsstýrisins. Sostatt er talan um eina sera órættvísa lóg, tí hon rakar fólk tilvildarliga.

Eisini er ætlanin, at øll virðisbrøv, føroysk partahrøv undantikin, skulu skattast. Ikki bert av einum møguligum vinningi, men eisini av innara virðinum. Landsstýrið roynir sostatt at leggja fót fyri tey, sum hava keypt obligatiónir og útlendsk partabrøv. Úrslitið kann verða, at vit longu hava sæð fleiri dømi um, at múgvandi føroyingar flyta burtur av landinum. Ilt er at siggja, hvussu hetta gagnar samfelgnum.

Meðan onnur lond gera skipanir fyri at fáa kapitalin at trívast í landinum, styggir Føroya Landsstýri hann burtur.

Fólk við lítlari og ongari inntøku, t.d. pensionistar, kunnu koma illa fyri av fíggjarognargjaldinum. Hava tey t.d. sett alla uppsparingina í virðisbrøv, sum av einihvørjari orsøk ikki kunnu

umsetast í pengar í skundi, eitt nú um keyparar ikki eru til virðisbrøvini, verður viðkomandi pantaður av Føroya gjaldstovu og verður drigin ígjøgnum systemið sum brotsmaður uttan møguleika at verja seg, av tí hann ikki hevur likvidan kapital tøkan.

Enn hevur landsstýrið ikki lagt ognarskatt á sethús og jørð, men hetta verður helst næsta stigið. Princippið um ikki at ognarskatta er fyri fyrstu ferð brotið, og helst endar tað sum við rentuskattinum, ið hækkaði sera skjótt hóast ætlanin í fyrsta umfari bert var at kvinka hann eitt sindur uppeftir.

Hagtøl frá bankunum vísa, at fólk seinastu árini hava tikið alla tilskrivaða rentu úr. Hetta hava tey gjørt, tí at tað hevur verið neyðugt fyri at klára skyldurnar, eftir at reallønin støðugt er lækkað. Tá ið tað almenna nú skal hava bróðurpartin av rentuni og í summum førum at kalla alla rentuna, verður tørt av høvðusstólinum. Uppskotið kemur tí at minka um uppsparingarevnini hjá fólki í framtíðini.

Minnilutin (Finnbogi Arge) heldur tað verða blóðskeivt at leggja eftir eftirlønarskipanum sum kapitalpensjón og lívstrygging. Fólk hava trúliga sett til viks hvønn mánaða til aldurdómin aftaná, at tey hava fingið politiskt lyfti um, at tryggingarskipanirnar ikki fóru at verða rørdar. Minnilutin kann heldur ikki taka undir við, at sethúsauppspararin, sum cinaferð fekk studning fyri at spara upp til egið hús, nú gjøgnum fíggjarognargjaldið verður við sviðusoð.

Fíggjarognaravgjaldið fer helst at føra við sær, at út- og innlánsrentan hjá tí, sum eigur og skyldar í sama banka, verður lagað soleiðis, at bæði út- og inlánsrentan eftir avtalu partanna millum lækkar við tí úrsliti, at landskassin als einki fær burturúr. Tað raðar bert um at lækka rentusatsirnar á báðum síðum.

Tað ber sostatt til at spekulera seg burtur úr fíggjarognargjaldinum.

Men hjá tí, sum bert skyldar og einki eigur, fer rentan upp, tí bankarnir noyðast at justera rentumarginalin og bruttoaviopsstigið uppeftir, nú fleiri skattir, eitt nú lønarhæddaravgjaldið, eru lagdir á bankarnar.

Við hesum viðmerkingum verður boðað frá, at minnilutin úr Sambandsflokkinum ikki tekur undir við lógaruppskotinum um fíggjarognaravgjald.

2. viðgerð 25. november 1993. At uppskot landsstýrisins við broytingum frá meirilutanum í skattanevndini skuldi fara til 3. viðgerð, samtykt við 17-11 atkvøðum.

2. desember 1993 legði meirilutin í skattanevndin fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Meirilutin í skattanevndini hevur til 2. viðgerð av tingmáli nr. 19/93 í høvuðsáliti nevndarinnar frá 25. november 1993 sett fram broytingaruppskot til lógaruppskotið frá landsstýrinum.

M.a. varð skotið upp, at satsurin í fíggjarognaravgjaldi varð lækkaður. Í høvuðsálitinum eru satslækkingarnar settar til 1,7%. Broytingar hesum viðvíkjandi vórðu tí gjørdar í § 8, § 10 og § 18, stk. 4, men í partaálitinum frá nevndini frá sama degi er sami 2% satsur í fíggjarognaravgjaldi sambært undirbroytingaruppskotinum settur til 1,9%. Tó hevur meirilutin ikki gjørt neyðugu konsekvensbroytingarnar í hinum greinunum, nevniliga § 10 og § 18, stk. 4.

Neyðugt verður at gera konsekvensbroyting í § 7 viðvíkjandi pantibrøvum.

Undir viðgerðini er orðingin í § 3, nr. 1, eisini umrødd. Í § 3, nr. 1, sum ásetir, hvør ikki kemur undir avgjaldsskyldu, stendur: "persónar, sum ikki hava bústað í Føroyum ella ikki eru fevndir av § 1 ella 2 í skattalógini.". Hetta er at skilja soleiðis, at tríggir møguleikar eru fyri frítøku eftir hesi áseting, og fevnir hetta um:

1) persónar, ið ikki eru búsitandi í Føroyum,
2) persónar, ið ikki eru undir fullari skattskyldu eftir § 1,
3) persónar, ið ikki eru undir avmarkaðari skattskyldu eftir § 2.

Víst hevur verið á, at mett verður neyðugt, at broytingin í pkt. 5 í nevndarálitinum, har frítøkan fyri klientkonti var strikað, eigur at verða umhugsað av nýggjum. Mett verður, at sjálv skipanin við klientkonti ger, at tílíkar konti ikki kunnu fylgja vanligu avgjaldsreglunum í hesi lóg. Hetta kemst m.a. av, at rentuinntøkan, ið peningastovnur tilskrivar kontoini, er millumverandi millum kontoeigaran og peningastovnin, meðan innistandandi á tílíkum konti ikki er ogn hjá viðkomandi advokati. Kontoeigarin/advokaturin hevur skyldu til at forrenta klientum sínum teirra innistandandi. Tílík rentuinntøka er hjá móttakaranum vanlig skatskyldug inntøka. Grundgeving landsstýrisins fyri at strika avgjaldsfrítøkuna var, at landsstýrið metti, at umgangilsismøguleikarnir øktust við hesum undantaki. Hetta verður ikki mett at vera samtíkt, tí skipanin við klientkonti er undirløgd serligum reglum frá Advokatráðnum, ið ger, at óviðkomandi peningur ikki uttan víðari eigur at verða plaseraður á tílíkum konti, og um so er, hevur skattavaldið eftirlitsmøguleikar fyri hesum.

Tí setir meirilutin í skattanevndini fram soljóðandi

Broytingaruppskot

1) § 2, nr. 3, verður orðað soleiðis: "virðisbrøv, tó ikki partabrøv og lutaprógv í felløgum, skrásett í Føroyum sbr. § 1, nr. 8, í skattalógini, pantibrøv og onnur lánsbrøv, ið eru ogn hjá fíggingarstovnum við føstum rakstrarstaði í Føroyum."
2) Í § 5, stk. 1, verður sum nr. 2 sett: "2) klientkonti hjá advokatum"

1) § 2, nr. 3, affattes således: "værdipapirer, dog ikke aktier og andelsbeviser i selskaber, indregistrerede på Færøerne jfr. § 1, nr. 8, i skatteloven, pantebreve og andre gældsbreve, der ejes af financierings med fast driftssted på Færøerne."
2) I § 5, stk. 1, indsættes som nr. 2: "2) advokaters klientkonti".

3) Í § 7 verður aftaná "partabrøvum" skoytt uppí: "lutaprógvum, pantibrøvum og lánsbrøvum."
4) Í § 10 og § 18, stk. 4 verður "1,7%" broytt til: "1,9%".
5) Í § 18, stk. 4 verður "0,5%" broytt til: "0,95%".

3) I § 7 tilføjes efter "aktier": "andelsbeviser, pantebreve og gældsbreve".
4) I § 10 og § 18, stk. 4, ændres "1,7%" til: "1,9%".
5) I § 18, stk. 4, ændres "0,5%" til: "0,95%".

2. desember legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Í uppskoti landsstýrisins verður gjørd hendan broyting:

Í § 3 verður sett sum nýtt pkt. 10:
"Grunnar og sjálvsognarstovnar, sum hava eitt sosialt endamál, og sum hava rentuinntøku sum høvuðsinntøku."

I landsstyrets forslag foretages følgende ændring:

I § 3 indsættes som nyt pkt. 10:
"Fonds og selvejende institutioner, der tjener en social hensigt, og som har renteindtægt som hovedindtægt."

Viðmerkingar

Hugsað verður serliga um grunnar, eitt nú Einkjugrunnin, Hjálpargrunnin fyri óarbeiðsførar fiskimenn, MBF, Psoreasisfelagið, Hjartafelagið, Krabbameinsfelagið, Barnahjálpargrunnin v.fl.

3. viðgerð 2. desember 1993. Málið við broytingunum frá meirilutanum í skattanevndini endaliga samtykt við 17-9 atkvøðum. Broytingaruppskotið frá fólkaflokkinum fall við 8-0 atkvøðum.

Lóg nr. 192 frá 10. desember 1993.

20 Broyting í løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum

Ár 1993, mikudagin 20. oktober legði Marita Petersen, løgmaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 62 frá 5. juni 1984 um evnisskráir hjá almennum myndugleikum við seinni broytingum verður í § 9 skoytt uppí sum nýggj 8., og 9. punktum:
"Gjaldstovuni verður heimilað at nýta persónnummarið í síni umsiting. Lønjavningargrunninum verður heimilað at nýta persónnummarið í síni umsiting av inntøkutrygd fiskimanna."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om offentlige myndigheders registre.

§ 1.

I lagtingslov nr. 62 af 5. juni 1984 om offentlige myndigheders registre tilføjes i § 9 som nye 8. og 9. punktum:
"Gjaldstovan bemyndiges til at benytte personnummeret i sin administration. Lønjavningargrunnurin bemyndiges til at benytte personnummeret i sin administration af indtægtsforsikring for fiskere."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Fyri at kunna umsita innkrevjingar- og mótrokningarskipanir, eisini t.d. í sambandi við meirvirðisgjaldsskipanina, hevur gjaldstovan fyri neyðini at kunna nýta persónnummarið.

Í sambandi við broytingar í reglunum um minstaforvinning verður neyðugt at nýta p-talið, um minstiforvinningurin verður treytaður av ársinntøkuni.

1. viðgerð 2. november 1993. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 18. februar 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 20. oktober 1993 og eftir 1. viðgerð 2. november 1993 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Rættarnevndin hevur havt fund við Maritu Petersen, løgmann, um málið. Løgmaður upplýsti, at landsstýrið hevur ásannað, at tað er óheppið, at lógin um evnisskráir er so ofta broytt, og hevur landsstýrið tí sett eina nevnd at endurskoða og dagføra lógirnar um almennar og privatar skráir. Arbeiðsnevndin skuldi eisini viðgera:
- Spurningar viðvíkjandi eintýddari skráseting av persónum og samkoyring av skráum.
- spurningin um datatrygd og starvsskipan fyri skrásetingareftirlitið.
- spurningar um frítøku frá kravinum um forskriftir fyri minni týðandi skráir og regluharmonisering við grannlondini,
- tryggleikan hjá tí einstaka borgaranum í sambandi við skrásetingarspurningar.

Meirilutin (Helena Dam á Neystabø, Mikkjal Sørensen, Hans Tausen Olsen og Lisbeth L. Petersen) kann taka undir við uppskoti landsstýrisins at heimila gjaldstovuni at nýta persónsnummarið í síni umsiting og at heimila lønjavningargrunninum at nýta persónsnummarið í síni umsiting av inntøkutrygd fiskimanna. Grundgeving meirilutans, at taka undir við uppskoti landsstýrisins, er, at tað er umráðandi at veita myndugleikunum bestu møgulcikar at umsita innkrevjing og útgjald av almennum peningi so ódýrt og effektivt sum gjørligt.

Meirilutin vísir á, at tað er óheppið, at løgtingslógin um evnisskráir hjá almennum myndugleikum ferð eftir ferð verður broytt og alsamt fleiri heimildir verða givnar at nýta persónsnummarið. Meirilutin heitir á landsstýrið um at taka øll neyðug stig til tess at dagføra lóggávuna og til tess at forða fyri, at almennir myndugleikar samskipa upplýsingar úr evnisskráum okkara.

Tann 23. november 1993 samtykti Føroya løgting við 27-0 atkvøðum eitt uppskot til samtyktar, ið er soljóðandi: "Í sambandi við innføring av sjálvvirkandi flyting av upplýsingum úr peningastovnum til líkningarvaldið verður álagt landsstýrinum at seta trygdarskipan (sikkerhedsprocedure) í verk, áðrenn sjálvvirkandi skipanin fer í gongd soleiðis, at tað bert eru tey, sum hava fingið til uppgávu at kanna skattaviðurskiftini hjá borgarunum, sum hava atgongd til upplýsingarnar. Teldutrygdarskipanin skal skipast soleiðis, at tað altíð ber til at staðfesta, hvør tað er, sum hevur kannað viðurskiftini hjá tí einstaka."

Samsvarandi hesum viðmerkingum setir meirilutin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður Føroya landsstýri at seta samtyktu trygdarskipan í verk beinanvegin, og sum skjótast at leggja fyri løgtingið álit um almennar og privatar evnisskráir og dagførda lóggávu, sum tekur øll neyðug fyrivarni fyri at almennar evnisskráir verða ikki misnýttar.

Minnilutin (Birgir Danielsen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins. Í hesum sambandi verður víst til ta stóru mótstøðu, sum hevur verið og framvegis er hjá tí føroyska fólkinum ímóti nýtslu av P-talinum í ymiskum almennum samanhangi. Serliga verður víst til tað framtak, sum fólkafloks ungdómur gjørdi við at samla saman 10.000 undirskriftir ímóti nýtslu av P-talinum og handa Føroya løgtingi hesar. Eina slíka "massiva" mótstøðu kann Føroya løgting ikki uttan víðari lata fara aftur við borðinum.

At arbeiða undir trýsti eftir kravboðum frá donsku stjórnini ger ikki støðuna betri.

Hetta uppskotið skumpar bert undir skriðuna, sum er lopin.
Viðmerkingarnar hjá meirilutanum eru bert vánaligt "smyrsl", nú ólukkurnar eru hendar.

Uppskotið hjá meirilutanum til samtyktar er ein sjálvfylgja eins og viðmerkingarnar um
- eintýðuga skráseting av persónum og samkoyring av skráum
- datatrygd og starvsskipan fyri skrásetingareftirlitið
- fritøku frá kravinum um forskriftir fyri minni týðandi skráir
- tryggleikan hjá tí einstaka borgaranum o.s.fr. eru uttan reellan týdning.

Hetta er bert eitt lítið dømi av mongum stórum um tað valdsavmarking, sum er farin og fer fram innan Løgtingsins gátt.

2. viðgerð 22. februar 1994. Atkvøðugreiðslan útsett. 25. februar varð samtykt at málið skuldi fara til 3. viðgerð við 18-0.

3. viðgerð 28. februar. Uppskotið endaliga samtykt við 19-0.

Lóg nr. 35 frá 24. mars 1994.

21 Broyting í arvagjaldinum

Ár 1993, mikudagin 20. oktober legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í lóg um arvaavgjald.

§ 1.

Í lóg frá 27. mars 1908 um arvagjald, sum hon er sett í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan nr. 468 frá 8. november 1921 við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, A, verður orðað soleiðis:
"Tá ið arvingarnir eru hjúnafelagi, eftirkomarar ella ættleiðingar: 8%".
2) § 2, B, verður orðað soleiðis:
"Tá ið arvingarnir eru foreldur ella eftirkomarar teirra, um so er at tey ikki koma undir litra A: 15%".
3) § 2, C, verður orðað soleiðis:
"Tá ið arvingarnir eru abbar ella ommur arvaleggjarans ella teirra eftirkomarar, um so er, at tey ikki koma undir litra A og litra B: 20%".
4) § 2, D, verður orðað soleiðis:
"Tá ið arvingarnir eru arvingar longur burtur í slektini ella arvurin fer til persónar, ið hann ikki er skyldur við: 30%".
5) Í § 2, seinasta stk., verður "Staten" broytt til: "landið" og "10 pct" broytt til: "35%".
6) § 3, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Arvagjald verður bara goldið av arvapørtum uppá 3.000 kr. og hægri."
7) Í § 3, stk. 2 verður "200 kr." broytt til: "5.000 kr."
8) Í § 3, stk. 3 verður "500 kr." broytt til: "10.000 kr."
9) § 43 verður orðað soleiðis:
"Arvagjaldið fer í landskassan."

lagtingslov om ændring i lov om arveafgift.

§ 1.

I lov af 27. marts 1908 om arveafgift, som denne er sat i kraft på Færøerne ved kgl. anordning nr. 468 af 8. november 1921 med senere ændringer, foretages følgende ændringer:

1) § 2, A, affattes således:
"Når arven tilfalder arveladerens ægtefælle, afkom eller adoptivbørn: 8%."
2) § 2, B, affattes således:
"Når arven tilfalder forældre eller personer henhørende til disses afkom, for såvidt de ikke falder ind under litra A: 15%."
3) § 2, C, affattes således:
"Når arven tilfalder arveladerens bedsteforældre eller personer henhørende til disses afkom, for såvidt de ikke falder ind under litra A eller litra B: 20%."
4) § 2, D, affattes således:
"Når arven tilfalder fjernere slægtninge af arveladeren eller personer, der ikke er beslægtet med ham: 30%."
5) I § 2, sidste stk. ændres "Staten" til: "landet" og "10%" til: "35%".
6) § 3, stk. 1 affattes således:
"Arveafgift svares kun af arvelodder på 3.000 kr. og højere."
7) I § 3, stk. 2 ændres "200 kr." til: "5.000 kr."
8) I § 3, stk. 3 ændres "500 kr." til: "10.000 kr."

9) § 43 affattes således:
"Arveafgiften tilfalder landskassen."

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1994 og er galdandi fyri arvagjald, har gjaldsskyldan byrjar aftaná 31. desembcr 1993.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1994 og finder anvendelse på afgiftspligt, der indtræder efter 31. december 1993.

Viðmerkingar:

Á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1994 er inntøkan á konto 3202: Arvagjøld, sett til 12,5 mió. kr.

Í fíggjarárinum 1992 var inntøkan 3.745.000 kr. og í 1993 verður inntøkan mett til 3,5 mió. kr. Galdandi reglur um arvagjøld eru lóg frá 27. mars 1908, sum hon er sett í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan nr. 468 frá 8. november 1921 við seinni broytingum. Prosentsatsirnir og krónuupphæddirnar, sum arvagjøldini verða roknað eftir, hava verið óbroytt, síðan lógin upprunaliga varð sett í gildi.

Í yvirlitinum niðanfyri verða víst verandi gjald og gjøldini, sum skotin verða upp:

Arvaflokkur:	Verandi gjald:	Uppskot:
A: Eftirkomarar	1 1/4% - 3%	8%
B: Foreldur og teirra eftirkomarar	4% - 6%	15%
C: Abbar, ommur og teirra eftirkomarar	7% - 9%	20%
D: Arvingar longur burtur í slekt o.o.	10% - 12%	30%
C: Stovnar, feløg o.t.	10%	35%.

Eftir broytingunum 6 - 8 verða minstuupphæddirnar, sum arvagjald verður roknað av, hækkaðar.

Eftir § 43 í lógini fer helvtin av arvagjaldinum í statskassan og hin helvtin í landskassan. Eftir uppskotinum verður hetta broytt solciðis, at alt arvagjaldið fer í landskassan. Broytingarnar eftir frammanfyri standandi uppskoti verða mettar at geva ta upphædd, id sett er av á fíggjarlógaruppskotinum.

Hetta er sama uppskot, sum landsstýrið legði fyri tingið í desember 1992, tó við teirri broyting, at í pkt. 5 er "50%" broytt til: "35%".

I. viðgerð 27. oktober 1993. Málið varð beint í skattanevndina. Burturdottið vegna samgonguslit.

FL jnr. 2581-1/92.

22 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan

Ár 1993, hósdagin 21. oktober legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1 verður orðað soleiðis: "Vísandi til § 54 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður skattur teirra, ið nevnd eru í § 1, nr. 1-6 og § 2, stk. 1 litra d, e og f í somu lóg, tit landskassan ásettur soleiðis:
Er inntøkan minni enn 22.500 kr., verður latið 0 %

er inntøkan kr.	men minni enn kr.	verður latið kr.	av	og av restini %
er indtægten kr.	men mindre end kr.	erlægges kr.	af	og af resten %
22.500	60.000	0	22.500	15%
60.000	140.000	5.626	60.000	31%
140.000	220.000	30.425	140.000	36+4=40%
220.000	300.000	63.225	220.000	39+6=45%
300.000		99.225	300.000	43+8=51%

§ 2

Henda lóg fær gildi 1. januar 1994.

lagtinslov um ændring i lagtingslov um fastsættelse af skat til landskassen.

§ 1.

I lagtinslov nr. 87 af 1.september 1983 um fastsættelse af skat til landskassen med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 1 affattes således: "Under henvisning til § 54 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer udskrives skatten for dem, der er omhandlet i § 1, nr. 1-6 og § 2, stk. 1. litra d, e og f i samme lov, til landskassen således:
Er indtægten mindre end 22.500 kr. erlægges 0.%

er indtægten kr.	men mindre end kr.	erlægges kr.	af	og af resten %
22.500	60.000	0	22.500	15%
60.000	140.000	5.626	60.000	31%
140.000	220.000	30.425	140.000	36+4=40%
220.000	300.000	63.225	220.000	39+6=45%
300.000		99.225	300.000	43+8=51%

§ 2

Denne lov træder i kraft 1. januar 1994.

Viðmerkingar:

Broytingin í lógini um áseting av skatti til landskassan ber í sær eina hækking í skattastiga-

num av teimum hægri inntøkunum. Samstundis er eykaskatturin, sum nú er innlagdur í talvuna.

Tað er eingin broyting í skattaviðurskiftunum hjá inntøkum upp til 140.000 kr.

Hjá inntøkubólkum upp til 220.000 kr. var skattaprosentið 36 og eykaskatturin 3% av inntøkuni omanfyri 140.000 kr. Skatturin verður nú hækkaður við 1% so skattaprosentið verður 40% av inntøkuni omanfyri 140.000 kr. hjá hesum bólki.

Hjá inntøkubólkinum upp til 300.000 kr. var skattaprosentið 39 og eykaskatturin 4% av inntøkuni omanfyri 220.000 kr. Skatturin verður nú hækkaður við 2%, so skattaprosentið nú verður 45% av inntøkuni omanfyri 220.000 kr. hjá hesum bólki.

Hjá inntøkubólkinum omanfyri 300.000 kr. var inntøkuprosentið 43% og eykaskatturin 5,5% av inntøkuni omanfyri 300.000 kr. Skattaprosentið verður nú hækkað við 2,5% so skattaprosentið nú er 51% av inntøkuni omanfyri 300.000 kr. hjá hesum bólki.

Hækkingin í skattastiganum fyri teir hægru lønarbólkarnar verður mett at geva landskassanum eina meirinntøku uppá umleið 9 milliónir.

Skattahámarkið verður í 1994 hækkað til 57%, og verður hetta mett at geva landskassanum eina meirinntøku upp á umleið 6 milliónir kr.

Ein orsøkin til at skattahámarkið er hækkað er, at hækkingin í vanliga skattastiganum annars bert hevði økt trýstið á miðalinntøkurnar og hægru miðalinntøkurnar, meðan hægru inntøkurnar framvegis høvdu havt sama skattatrýst sum áður.

Av tí at eykaskattirnir, sum hava verið álagdir hægru inntøkunum, vóru álíknaðir uttan atlit til skattahámarkið, hevur skattaprosentið fyri hægru inntøkurnar verið 53-55%. Fyri hægru inntøkurnar er sostatt talan um eina hækking uppá 2-4%.

Harafturat verður mett, at hækkingin av rentuskattinum upp til 22% hevur ta ávirkan, at fólk gjalda lán við peningi, tey hava innistandandi. Hervið lækkar rentufrádrátturin, og skuldi hetta givið landskassanum eina meirinntøku uppá 6-8 milliónir kr.

Nevndu skattabroytingar eru sostatt mettar at geva landskassanum eina meirinntøku uppá 21-23 milliónir krónur í meirinntøku í 1994.

1. viðgerð 27. oktober 1993. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. november 1993 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 21. oktober 1993 og eftir 1. viðgerð 27. oktober 1993 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við umboð fyri Toll- og

Skattastovu Føroya.

Undir viðgerðini hevur Toll- og Skattastovan gjørt vart við, at útrokningarnar í skattastiganum ikki eru rættar. Eitt mistak er hent í sambandi við innskriving av lógini, tær síðstu rættingarnar eftir, at satsirnir vóru broyttir umaftur og umaftur eru ikki innskrivaðar, og útrokningarnar relatera tí fyri tað mesta til satsir, sum eru 1% hægri, enn teir í verandi uppskoti. Metast má tó, at talan í hesum føri er um beinleiðis skrivivillur, tá útrokningin í skattastiganum fyri so vítt talar fyri seg sjálva. Neyðugt verður tí ikki við broytingaruppskoti til løgtingsmál nr. 22/1993. Røttu tølini eru annars hesi:

22.500	60.000	0	22.500	15%
60.000	140.000	5.625	60.000	31%
140.000	220.000	30.425	140.000	36+4=40%
220.000	300.000	62.425	220.000	39+6=45%
300.000		98.425	300.000	43+8=51%

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Lasse Klein, Eyðálvur Dimon og Heini O. Heinesen) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) tekur ikki undir við uppskotinum og vísir til álit í løgtingsmáli nr. 19/1993.

Minniiutin (Finnbogi Arge) tekur ikki undir við málinum og vísir til grundgevingarnar í minnilutaálitinum til løgtingsmál nr. 26.

2. viðgerð 25. november 1993. Uppskotið samtykt við 17-9.

3. viðgerð 2. desember 1993. Uppskotið endaliga samtykt við 17-7.

Lóg nr. 196 frá 10. desember 1993.

23 Løgtingslóg um avmarking av hækkingum í lønum v.m.

Ár 1993, mikudagin 20. oktober legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljoðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um avmarking av hækkingum í lønum v.m.

§ 1. Í tíðarskeiðinum frá 20. oktober 1993 til 1. mars 1995 kunnu ikki gerast gildugar avtalur, góðkenningar ella ásetingar um hækkingar í lønum v.m. enn tær, sum eru galdandi 20. oktober 1993.
Stk. 2. Í tí í stk. 1 nevnda tíðarskeiði kann ikki verða avtalað, góðkend ella áset hægri samsýning fyri arbeiði v.m. fyri tíðina eftir, at tíðarskeiðið, lønarsteðgurin var galdandi, er runnið, uttan so at hetta verður gjørt í sambandi við nýggjan kollektivan sáttmála ella avtalu.

§ 2. Lógin forðar ikki fyri, at tað á økjum. har akkord, bonusskipanir ella aðrar líknandi lønarskipanir verða nýttar, verða gjørdar nýggjar skipanir fyri útrokningargrundarlagið fyri akkordum v.m. í sambandi við nýggja tøkni, nýggjar arbeiðshættir ella nýggja framleiðslu, tó bert um tað ikki førir við sær, at inntøkugrundarlagið hækkar.

§ 3. Í tíðarskeiðnum fram til 1. mars 1995 kunnu ikki fyri arbeiði, sum innan 20. oktober 1993 vóru lønt við tíðarløn, verða gjørdar akkordskipanir, bonusskipanir ella aðrar líknandi lønarskipanir.

§ 4. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Hon er galdandi frá 20. oktober 1993.

lagtingslov om begrænsning af forhøjelser af lønninger m.v.

§ 1. Der kan ikke for perioden 20. oktober 1993 til 1. marts 1995 gyldigt aftales, fastsættes eller godkendes højere løn m.v. end de pr. 20. oktober 1993 gældende.
Stk. 2. Der kan ikke i den i stk. 1 nævnte periode aftales, fastsættes eller godkendes højere løn m.v. for tiden efter periodens udløb, medmindre dette sker i forbindelse med fornyelse af en kollektiv overenskomst eller aftale.

§ 2. Loven er ikke til hinder for, at der på områder, hvor der anvendes akkord, bonusordninger eller andre lignende lønsystemer, foretages omvurdering af beregningsgrundlaget for akkorder m.v. i forbindelse med indførelse af ny teknik, nye metoder eller ny produktion, når blot indtjeningsgrundlaget ikke herved hæves.

§ 3. Der kan ikke i tiden indtil 1. marts 1995 indføres akkord, bonusordninger eller andre lignende lønsystemer for arbejde, der pr. 20. oktober 1993 var aflønnet med tidløn.

§ 4. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen. Den har virkning fra 20. oktober 1993.

Viðmerkingar:
Landsstýrið hevur sagt seg ikki vilja leggja upp í viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum við lóg

uttan so, at allir teir møguleikar, sum eru innan arbeiðsrættarligu skipanina fyrst vóru troyttir. Landsstýrið hevur ikki broytt áskoðan í hesum máli.

Hinvegin má ásannast, at skulu vit koma burtur úr verandi kreppu, verður neyðugt at minka kostnaðarstøðið. Í eini roynd at tálma kostnaðinum fyri vørur og tænastur hevur landsstýrið tí avgjørt at leggja fram uppskot til lóg um lønarsteðg. Somuleiðis verður lagt fram uppskot til løgtingslóg um prissteðg.

Uppskotið ber í sær, at tað í tíðarskeiðnum lógin er í gildi, kunnu ikki gerast avtalur um hægri lønir v.m. Av tí at skotið verður upp, at lógin hevur gildi til 1. mars 1995, førir tað við sær, at tað í sambandi við at sáttmálar verða uppsagdir ella fara úr gildi í hesum tíðarskeiði, ikki kann verða gjørd avtala um hægri løn. Hinvegin forðar uppskotið ikki fyri, at avtalur verða gjørdar um lægri løn, eins og tað kunnu gerast avtalur um onnur viðurskifti í sáttmálunum treytað av, at tær ikki føra lønarvøkstur v.m. við sær.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar.

Til § 1

Ásetingin í 1. stk. ber í sær, at tað aftan á 20. oktober 1993 hvørki í sambandi við sáttmála ella aðra avtalu kunnu fara fram hækkingar av tí løn, sum var galdandi tann 20. oktober 1993 t.v.s., sum var galdandi náttina millum 19. og 20. oktober 1993.

Tað sama er galdandi fyri lønir, sum verða ásettar av bert øðrum partinum.

Í førum, har avtala um hægri løn, sum er gjørd innan 20. oktober 1993, skal góðkennast av einum øðrum parti fyri at fáa gildi, kann slík góðkenning ikki verða givin í tí tíðarskeiði, lønarsteðgurin fevnir um.

Tað, sum er avgerandi fyri, um ein avtala hevur gildi ella ikki, er, um hon var rættliga bindandi innan 20. oktober 1993.

Uppskotið forðar ikki fyri, at lønirnar hækka eftir 20. oktober 1993, tá bert grundarlagið fyri hækkingini er ein rættliga bindandi avtala, sum er gjørd innan 20. oktober 1993. Tær lønarhækkingar, sum tað eftir hesum verður talan um, kunnu verða aldursviðbøtur og møguligar avtalaðar hækkingar í tíðarskeiðnum. Hetta førir eisini við sær, at verður kollektivur sáttmáli gjørdur í hesum tíðarskeiði, sum ber lønarvøkstur við sær, fær lønarhækkingin ikki gildi, fyrrenn frá tí degi henda lóg fer úr gildi og bert galdandi framyvir.

Ein avtala um lønarhækkingar, sum verður gjørd 20. oktober 1993 ella seinni, er ikki gyldug, sjálvt um hon hevur heimild í áður galdandi avtalu.

Við løn er at skilja allar samsýningar, sum verða latnar fyri arbeiði, tað veri seg árs-, mánaðar-, 14 daga-, viku- ella dagløn, akkordsamsýningar, gratiale, samsýningar, bonus, eftirlønargjøld v.m.

Uppskotið umfatar lønina, sum er ásett ella avtalað fyri tað ávísa arbeiðið, ikki útgjaldið til tann einstaka løntakaran. Hetta merkir, at tað t.d. ber til, at ein løntakari, sum arbeiðir yvir,

fær meira í løn, bert má yvirtíðarsamsýningin ikki vera roknað út frá sama grundarlagi sum áðrenn 20. oktober 1993.

Løn fyri nýtt arbeiði er heldur ikki umfatað av uppskotinum. Hetta merkir, at uppskotið ikki forðar fyri hægri løn, um hon stavar frá, at viðkomandi er farin í hægri starv. Bert má lønin í tí hægra starvinum ikki vera í hægri lønarflokki enn tí undangongumaðurin í starvinum fekk.

Um starvsinnihaldið verður broytt í verandi starvi hjá løntakara, gevur hetta hinvegin ikki rætt til hægri løn.

Til § 2
Innan tey øki, har akkord- ella bonusskipanir verða nýttar, verða hesar avtalur javnan broyttar, antin tí at framleiðslutreytir broytast, ella tí akkordavtalan er gjørd fyri ávísa arbeiðsuppgávu. Slíkar broytingar kunnu gerast, meðan henda lóg er í gildi um tær stava frá nýggjari tøkni, nýggjum arbeiðshættum og nýggjari ella broyttari framleiðslu. Tað mugu hinvegin í hesum sambandi gerast hækkingar í útrokningargrundarlagnum fyri hesar broytingar.

Til § 3
Innan fleiri arbeiðsøki er møguleiki fyri at skifta ímillum at fáa løn fyri ta tíð arbeiðið tekur, t.v.s. tíðarløn, sum t.d. er tímaløn, vikuløn, ella mánaðarløn tí at veita løn fyri nøgdina av arbeiði, ið gjørt verður, t.v.s. akkordløn. Ásetingin í hesi grein skal forða fyri, at roynt verður at umganga reglurnar í hesi lóg við at skifta frá tíðarløn til akkordløn í tíðarskeiðnum lønarstøðgur er.

1. viðgerð 28. oktober 1993. Málið varð beint í arbeiðaramálanevndina, sum 3. november 1993 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 20. oktober 1993 og eftir 1. viðgerð 28. oktober 1993 beint í arbeiðaramálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við løgmann og stjóran fyri lønardeildina í landsstýrinum. Eisini hevur nevndin fingið skriv frá Føroya Arbeiðarafelag og Starvsmannafelagnum um málið. Nevndin ger vart við, at í viðmerkingunum til tær einstøku greinarnar í uppskoti landsstýrisins eru tvær villur á næstseinastu síðu. Í viðmerkingunum til § 1 í triðseinasta reglubroti, næstseinastu linju, er eitt "ikki" komið ov nógv, har skal standa: "..., bert má yvirtíðarsamsýningin vera roknað úr frá sama grundarlagi sum áðrenn 20. oktober 1993." Í viðmerkingini til § 2 manglar eitt "ikki" í seinasta setningi, har skal standa: "Tað mugu hinvegin ikki í hesum sambandi gerast hækkingar í útrokningargrundarlagnum fyri hesar broytingar.".

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í eina meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Heini Johansen, Hildur Patursson og Karl Heri Joensen) vísir á, at landsstýrið hevur boðað frá, at løgtingsmál nr. 24/1993: Løgtingslóg um leinging av ávísum

lønarsáttmálum og avtalum, verður tikið aftur. Landsstýrið sigur í viðmerkingunum til fyriliggjandi lógaruppskot, at uppskotið m.a. er lagt fram við tí endamáli, at eingin ivi skal vera um, hvør lønartalva er í gildi 1. januar 1994, tann sambært fiskoytissemjuni ella lønaravtalan sambært sjálvan sáttmálan. Meirilutin heldur ikki, tað er ivi um, at tað er lønin í fiskoytisavtalunum, sum er galdandi, men skjýtur upp, at §1, stk. 1, verður neyvari orðað, so eingin ivi er hesum viðvíkjandi. Eisini verður mælt til, at § 3 í fyriliggjandi lógaruppskoti og viðmerkingar landsstýrisins til hesa grein verða strikaðar. Meirilutin heldur eisini, at serstaki spurningurin viðvíkjandi skipara- og navigatørfelagnum kann loysast í lógini um lønarsteðg. Ásannandi fíggjarstøðuna, ið ger, at eingir møguleikar eru at hækka lønir í løtuni, tekur meirilutin undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað við frammanfyri nevndu broytingum og setir tí samsvarandi hesum fram soljóðandi

broytingaruppskot

1) § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Í tíðarskeiðnum frá 20. oktober 1993 til 1. mars 1995 kunnu ikki gerast gildugar avtalur, góðkenningar ella ásetingar um hækkingar í lønum v.m. enn tær lønir v.m., sum sambært avtalu eru galdandi 20. oktober 1993."
2) Sum nýtt § 1, stk. 2 verður sett: "Hava felløg ella einstaklingar innan 20. oktober 1993 gjørt avtalu við arbeiðsgevara um niðurgongd í løn, sum er størri enn 8,5% av lønini sambært lønaravtalu galdandi 1. januar 1993 kunnu hesi hóast áseting-arnar í stk. 1 gera gilduga avtalu um, at lønin hækkar til lønina innan niðurskurðin, lækkað við 8,5%."
3) § 1, stk. 2 verður stk. 3.
4) § 3 verður strikað.
5) § 4 verður § 3.

1) § 1, stk. 1, formuleres således: "I perioden fra 20. oktober 1993 til 1. marts 1995 kan der ikke indgås gyldige aftaler, godkendelser eller bestemmelser om lønforhøjelser m.v. end de lønninger m.a. der i henhold til aftale er gældende 20. oktober 1993."
2) Som nyt § 1, stk. 2, indsættes: "Har organisationer eller enkeltpersoner inden 20. oktober 1993 indgået aftaler med arbejdsgiver om lønreduktioner, der er større end 8,5% af lønnen i henhold til løntavle gældende 1. januar 1993 kan disse uanset bestemmelserne i stk. 1 indgå aftale om at lønnen reduceres til lønnen forinden reduktionen formindsket med 8,5%."
3) § 1, stk. 2 bliver stk. 3.
4) § 3 slettes.
5) § 4 bliver § 3.

Minnilutin (Jógvan I. Olsen) vísir á, at Sambandsflokkurin hevur ta støðu, at avtalur um lønir og annað eiga at verða gjørdar av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum. Politiski myndugleikin eigur bert í heilt serligum føri við lóg at leggja seg út í arbeiðsmarknaðin. Áðrenn slíkt stig verður tikið, eiga allir møguleikar fyri at finna loysnir við samráðingum at verða troyttir, og tað er ikki gjørt í hesum føri.

Minnilutin (Jógvan Ingvard Olsen) tekur tí ikki undir við uppskotinum.

Minnilutin (Birgir Danielsen) førir fram:
Ásannandi tað neyðuga í at fáa neyðugan pening til samfelagið, er minnilutin av teirri fatan, at tær peningaupphæddir, sum eru lærtar bæði 28. mai 1993 og 12. oktober 1993 í ov lítlan

mun verða nýttar til
1) at seta gongd aftur í samfelagið,
2) at betra um kappingarførið, herundir lækkan av kostnaðarstøðinum,
3) ov lítil dentur er lagdur á betran av marknaðarstøðuni mótvegis EF.
4) at kalla eingin umrøða av skerjingum á fíggjarlógini, sum er ein neyðug fortreyt fyri framhaldi í samfelagnum.

Víst verður annars til fólkafloksins minnilutauppskot í fíggjarnevndini í løgtingsmálunum nr. 15/1993: Løgtingslóg um lántøku til landskassan og nr. 16/1993: Avtala millum donsku stjórnina og Føroya Landsstýri um endurfígging og kapitalinnskot í bankarnar v.m.

Minnilutin (Birgir Danielsen) tekur ikki undir við uppskotinum.

2. viðgerð 16. november 1993. Broytingaruppskotið samtykt við 17-0.

3. viðgerð 25. november 1993. Broytingaruppskotið endaliga samtykt við 17-0.

Lóg nr. 190 frá 8. desember 1993.

24 Løgtingslóg um leinging av ávísum lønarsáttmálum og avtalum

Ár 1993, mikudagin 20. oktober legði løgmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um leinging av ávísum lønarsáttmálum og avtalum.

§ 1. Sáttmálar og fiskoytissáttmálar um lønar- og setanarkor millum landsstýrið og Føroya Pedagogfelag, Føroya Pleygarafelag, Føroya Sjúkrahjálparafelag, Føroya Teknikarafelag, Føroya Verkfrøðingafelag, Føroyskar Ergoterapeutar Føroyskar Fysioterapeutar, Føroyskar Laborantar, Havnar Arbeiðsmannafelag, Magistarafelag Føroya, Maskinmeistarafelagið, Sjúkrasystrafelag Føroya, Starvsmannafelagið, Tænastumannafelag Landsins, Yrkisfelag Føroya Studentaskúla og HF-lærara, Øko-

lagtingslov om forlængelse af visse lønoverenskomster og aftaler.

§ 1. I overenskomster og tillægsoverenskomster mellem landsstyret og Føroya Pedagogfelag, Føroya Pleygarafelag, Føroya Sjúkrahjálparafelag, Føroya Teknikarafelag, Føroya Verkfrøðingafelag, Føroyskar Ergoterapeutar Føroyskar Fysioterapeutar, Føroyskar Laborantar, Havnar Arbeiðsmannafelag, Magistarafelag Føroya, Maskinmeistarafelagið, Sjúkrasystrafelag Føroya, Starvsmannafelagið, Tænastumannafelag Landsins, Yrkisfelag Føroya Studentaskúla og HF-lærara, Øko-

nomafelag Føroya, Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya, Føroya Byggifrøðingafelag, Føroya Lærarafelag, Føroya Postfelag, Føroya Handverkarafelag og Føroya Ljósmøðrafelag, sum fara úr gildi 1. januar 1994, verða framlongdir at galda til 1. mars 1995.

Stk. 2. Í ískoytissáttmálunum millum landsstýrið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag verður hóast ásetingarnar í løgtingslóg um avmarking av hækkingum í lønum v.m. 10,39% broytt til 8,5%.

Stk. 3. Í ískoytissáttmálanum millum landsstýrið og Danske Apoteksassistenters Forening verða hóast ásetingarnar í løgtingslóg um avmarking av hækkingum í lønum v.m. 7,55% broytt til 7%, 25,55% til 25% og 9,35% til 8,5%.

Stk. 4. Semjurnar millum Føroya Landsstýri og Samráðingarnevndina fyri undirvísarar á teim Teknisku Skúlunum og starvsfólkini á Føroya Maskinskúla, sum fara úr gildi 1. januar 1994, verða framlongdar at galda til 1. mars 1995.

nomafelag Føroya, Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya, Føroya Byggifrøðingafelag, Føroya Lærarafelag, Føroya Postfelag, Føroya Handverkarafelag og Føroya Ljósmøðrafelag, som udløber 1. januar 1994, forlænges til 1. marts 1995.

Stk. 2. I tillægsoverenskomsterne mellem landsstyret og Føroya Skipara- og Navigatørfelag ændres trods bestemmelserne i lagtingslov om begrænsning af forhøjelser af lønninger m.v. 10,39% til 8,5%.

Stk. 3. I tillægsoverenskomsten mellem landsstyret og Danske Apoteksassistenters Forening ændres trods bestemmelserne i lagtingslov om begrænsning af forhøjelser af lønninger m.v. 7,55% til 7%, 25,55% til 25% og 9,35% til 8,5%.

Stk. 4. Aftalerne mellem landsstyret og Samrådingarnevndin fyri undirvísarar á teim Teknisku Skúlunum og personalet på Føroya Maskinskúli, som udløber 1. januar 1994, forlænges til 1. marts 1995.

§ 2. Framlongdu sáttmálarnir kunnu uppsigast av báðum pørtum við í minsta lagi 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til 1. mars 1995.

§ 2. De forlængede overenskomster kan opsiges med 3 måneders varsel, dog tidligst til den 1. marts 1995.

§ 3. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 3. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Flestu sáttmálarnir á almenna arbeiðsmarknaðinum vórðu í vetur eftir avtalu við fakfeløgini longdir til 1. januar 1994. Samstundis varð gjørd ískoytissemja um lønarniðurskurð v.m.. Hetta merkir, at sáttmálaloysi er 1. januar 1994, bæði hvat viðvíkur sjálvum sáttmálunum og ískoytissáttmálunum.

Landsstýrið hevur júst lagt fram uppskot fyri tingið um lønarsteðg. Hetta merkir, sum eisini er sagt í viðmerkingunum til lógaruppskotið, at tað ikki kunnu gerast avtalur, sum føra við sær hægri lønir í tíðarskeiðinum, lønarsteðgur er.

Landsstýrið er eisini komið til ta niðurstøðu ikki at krevja størri lønarlækkingar yvir fyri almennu fakfeløgunum enn tær, avtala er gjørd um. Landsstýrið er eisini varugt við, at tá sáttmálarnir og ískoytissemjurnar fara úr gildi 1. januar 1994, kann tvídráttur verða um, hvør

lønartalva er galdandi 1. januar 1994 - tann sambært sáttmálanum ella tann sambært ískoytissemjuni.

Við støði í hesum hevur landsstýrið tí avgjørt at leggja fram uppskot fyri tingið um at leingja bæði sáttmálar og ískoytisavtalur til 1. mars 1995. Orsøkin til, at skotið verður upp at leingja sáttmálarnar til 1. mars 1995 er, at sum kunnugt verður val næsta ár, og tekur tað vanliga nakrar mánaðir at skipa landsstýri.

Verða sáttmálarnir longdir, merkir hetta, at lønarniðurskurðurin, sum í 1993 er umleið 7,79% av ársløninni, verður umleið 8,5% av ársløninni í 1994.

Hvat viðvíkur ískoytissáttmálunum hjá teimum í stk. 2 og 3 nevndu feløgunum, er lønarlækkingin sett til annan %-part enn stendur í ískoytisavtaluni. Hetta kemst av, at í ískoytissemjuni við hesi feløg eru avtalurnar soleiðis háttaðar, at hesi feløgini fara meira niður í løn næsta ár enn hini feløgini, um %-parturin av lønini verður óbroyttur. Feløgini, talan er um, gjørdu sáttmála ávikavist frá 1. apríl 1993 og 1. mars 1993 og var %-parturin í lønarniðurskurðinum tí nakað hægri enn hjá hinum feløgunum, sum gjørdu ískoytissáttmála frá 1. februar 1993.

Sum kunnugt gjørdi landsstýrið í summar sáttmála við heimahjálparafelagið og hjálparlæknarnar, eftir at limirnir í feløgunum høvdu verið undir verkbanni í umleið 3 vikur. Sáttmálarnir eru galdandi til 1. juni 1995 og merkja, at limir í hesum báðum feløgunum "bert" fóru 4,8% niður í løn. Landsstýrið er varugt við, at hesi bæði feløg hava merkt minni og fara at merkja minni til lønarniðurgongdina enn hini feløgini, men gerst onki við tað nú. Landsstýrið er ikki sinnað at lóggeva lønirnar niður í einum sáttmálaskeiði.

1. viðgerð 28. oktober 1993. Málið varð beint í arbeiðaramálanevndina, sum 3. november 1993 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 20. oktober 1993 og eftir 1. viðgerð 28. oktober 1993 beint í arbeiðaramálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við løgmann, sum vegna landsstýrið boðaði frá, at landsstýrið ynskir at taka málið aftur.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Heini Johansen, Hildur Patursson og Karl Heri Joensen) vísir á, at løgmaður hevur boðað frá, at landsstýrið ynskir at taka málið aftur og setir tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Ingvard Olsen og Birgir Danielsen) hevur ikki ætlanir um at taka undir við lógaruppskotinum og fer heldur ikki at taka málið upp aftur í løgtinginum tá uppskotið um afturtøku kemur fyri.

2. viðgerð 16. november 1993. Málið varð afturtikið av landsstýrinum.

25 Løgtingslóg um prístreðg

Ár 1993, mikudagin 20. oktober legði landsstýrið fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um prístreðg.

§ 1. Vinnurekandi innan íðnað, handverk og handil kunnu við sølu av vørum her á landi ikki taka hægri prísir enn teir, ið eru lógligt galdandi 18. oktober 1993.
Stk. 2. Tó kunnu framleiðarar hækka prísirnar svarandi til hækkingar í prisinum fyri rávørur og evni nýtt til framleiðsluna. Innflytarar, heilsølur og smásølur kunnu, tá selt verður víðari, hækka prísirnar við upphæddum samsvarandi hækkingum í innkeypsprísinum.

§ 2. Fyri flutnings- og tænastuveitingar her á landi kunnu ikki takast hægri prísir, gjøld ella samsýningar enn tað, ið var lógligt galdandi 18. oktober 1993.
Stk. 2. Hóast ásetingarnar í stk. 1 kunnu gjøld fyri flutningsveitingar hækkast við upphæddum samsvarandi hækkingum, ið stava frá útreiðslum til olju og smyrjiolju. Fyri tænastuveitingar kunnu prísir, gjøld og samsýningar hækkast við upphæddum samsvarandi prishækkingum á tilfari, sum verður nýtt til tænastuveitingarnar.

§ 3. Viðvíkjandi prishækkingum sambært § 1, stk. 2 og § 2, stk. 2 skal kostprísreglan nýtast.
Stk. 2. Hóast reglurnar í § 1, stk. 1 og § 2, stk. 1 kunnu virkir rokna inn í prísin: Hækkingar í gjaldinum fyri tænastuveitingar, almenn gjøld og avgjøld, flutningsútreiðslur, húsaleigu og hita og hægri tryggingargjøld.

§ 4. Um útreiðslurnar, sum nevndar eru í §§ 1, 2 og 3 lækka, skulu prísirnir lækkast

lagtingslov om stop for priser.

§ 1. Erhvervsdrivende inden for industri, håndværk og handel må ved salg af varer her i landet ikke tage højere priser end de den 18. oktober 1993 lovligt gældende.
Stk. 2. Uanset bestemmelsen i stk. 1 må producenter forhøje priserne med beløb til dækning af stigninger i priser for råvarer og hjælpestoffer. Importører, grossister og detailister må ved videresalg af varer forhøje priserne med beløb til dækning af stigninger i indkøbsprisen.

§ 2. For transport- og tjenesteydelser her i landet må der ikke tages højere priser, takster eller honorarer end de den 18. oktober 1993 lovligt gældende.
Stk. 2. Uanset bestemmelserne i stk. 1 må takster for transportydelser forhøjes med beløb til dækning af stigninger i udgifter til driv- og smøremidler. For tjenesteydelser må priser, takster og honorarer forhøjes med beløb til dækning af stigning i priser på materialer, som medgår til tjenesteydelserne.

§ 3. Ved prisforhøjelser i henhold til § 1, stk. 2 og § 2, stk. 2 anvendes kostprisprincippet.
Stk. 2. Uanset bestemmelserne i § 1, stk. 1 og § 2, stk. 1 kan virksomhederne indregne: Stigninger i betaling for serviceydelser, offentlige takster og afgifter, transportomkostninger, husleje og varme samt højere forsikringspræmier.

§ 4. Ved fald i de i §§ 1-3 nævnte omkostninger skal priserne nedsættes til-

samsvarandi.

§ 5. Reglurnar í §§ 1-4 eru á sama hátt galdandi fyri prísir, ið av virki eru fráboðaðir at verða fyri viðarisølu í eftirfylgjandi søluliðum.

§ 6. Reglurnar í §§ 1-5 eru eisini galdandi fyri almenn og loyvishavandi virkir, tá ið tey selja vørur og veita flutning og tænastur.

§ 7. Prísráðið hevur eftirlit við, at reglurnar í hesi lóg verða hildnar.
Stk. 2. Prísráðið kann í serstøkum førum geva undantaksloyvi frá reglunum í §§ 1-6.
Stk. 3. Avgerðir Prísráðsins kunnu kærast til Yvirprísráðið í seinasta lagi 14 dagar aftaná, at Prísráðið hevur boðað frá avgerð síni.
Stk. 4. Kæra um avgerð Prísráðsins virkar ikki frestandi uttan so, at Yvirprísráðið tekur aðra avgerð.

§ 8. Virkini skulu kunna skjalprógva grundarlagið fyri prísunum galdandi 18. oktober 1993.
Stk. 2. Príshækkingar skulu fráboðast Prísráðnum áðrenn tær verða framdar, og skal skjalatilfar hækkingunum viðvíkjandi leggjast við.
Stk. 3. Um virkir ikki kunnu skjalprógva grundarlagið fyri prísunum galdandi 18. oktober 1993 ella seinni príshækkingum, kann Prísráðið gera av, at prísirnir verða lækkaðir til upphædd, sum ráðið metir samsvarar best við ásetingarnar í §§ 1-6.

§ 9. Við sekt ella hefti verður revsaður tann, ið
1. brýtur §§ 1-6,
2. ikki ger eftir boðum ella brýtur bann, ið lagt er eftir lógini,
3. ikki gevur upplýsingar, ið kravdar verða av honum eftir lógini.

Stk. 2. Tann, sum í viðurskiftum, ið høvra

svarende.

§ 5. Bestemmelserne i §§ 1-4 finder tilsvarende anvendelse på priser, der af en virksomhed er tilkendegivet for videresalg i efterfølgende omsætningsled.

§ 6. Bestemmelserne i §§ 1-5 finder også anvendelse ved offentlige og koncessionerede virksomheders salg af varer og levering af transport og tjenesteydelser.

§ 7. Prisrådet fører tilsyn med overholdelsen af bestemmelserne i denne lov.
Stk. 2. Prisrådet kan i særlige tilfælde gøre undtagelse fra bestemmelserne i §§ 1-6.
Stk. 3. Prisrådets afgørelser kan ankes til Overprisrådet senest 14 dage efter, at Prisrådet har givet meddelelse om sin afgørelse.
Stk. 4. Indgivelse af klage over Prisrådets afgørelse har ikke opsættende virkning medmindre Overprisrådet bestemmer andet.

§ 8. Virksomhederne skal kunne dokumentere grundlaget for de den 18. oktober 1993 gældende priser.
Stk. 2. Prisforhøjelser skal anmeldes til Prisrådet inden forhøjelserne finder sted og ledsages af dokumentationsmateriale.
Stk. 3. Såfremt virksomheder ikke kan dokumentere grundlaget for de den 18. oktober 1993 gældende priser eller for senere prisforhøjelser, kan Prisrådet kræve priserne nedsat til et beløb, som rådet finder bedst stemmende med bestemmelserne i §§ 1-6.

§ 9. Med bøde eller hæfte straffes den, der
1. overtræder §§ 1-6,
2. undlader at efterkomme påbud eller overtræder et forbud, udstedt ifølge loven eller
3. undlader at meddele oplysninger, som afkræves ham ifølge loven.

Stk. 2. Den, som i forhold, der er omfattet

undir lógina, gevur Prisráðnum ella Yvirprísráðnum rangar ella villleiðandi upplýsingar ella tigur burtur viðurskifti, ið hava týdning fyri avgerð í málinum, verður revsaður við sekt ella hefti, uttan so er, at hann hevur uppiborið harðari revsing eftir borgarligu revsilógini.

Stk. 3. Í forskriftum, ið verða givnar av landsstýrinum sambært lógini, kann verða ásett revsing við sekt ella hefti fyri brot á ásetingar í forskriftunum.

Stk. 4. Er brot framt av partafelag, lutafelag ella slíkum, kann felagið sjálvt koma undir sektarábyrgd.

Stk. 5. Fyrningarfrest fyri revsiábyrgd er 5 ár.

Stk. 6. Við viðgerð av málum sambært hesi grein verða nýttar reglurnar í lóg um rættargang kap. 71 um inndrátt og kap. 72 um rannsókn í sama mun sum í málum, sum statsákæran reisir.

Stk. 7. Letur onkur vera við at lata inn fráboðan rættstundis sambært § 2 ella at geva Prisráðnum umbidnar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at ráðið kann røkja sínar skyldur sambært lógini, kann Prisráðið áleggja viðkomandi at gera skyldu sína hesum viðvíkjandi, ella kemur hann undir dagliga sekt ella sekt um vikuna, ið kann verða innheintað við panting.

§ 10. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

af loven, meddeler Prisrådet eller Overprisrådet urigtige eller vildledende oplysninger eller fortier forhold af betydning for den pågældende sags afgørelse, straffes med bøde eller hæfte, medmindre strengere straf er forskyldt efter borgerlig straffelov.

Stk. 3. I forskrifter, der udstedes af landsstyret i henhold til loven, kan der fastsættes straf af bøde eller hæfte for overtrædelse af bestemmelser i forskrifterne.

Stk. 4. Er en overtrædelse begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan bødeansvar pålægges virksomheden som sådan.

Stk. 5. Forældelsesfristen for strafansvaret er 5 år.

Stk. 6. Ved behandling af sager i henhold til denne paragraf anvendes reglerne i lov om rettens pleje kap. 71 om beslaglægning og kap 72 om ransagning i samme omfang som i sager, der påtales af statsadvokaten.

Stk. 7. Undlader nogen rettidigt at indgive anmeldelse i henhold til § 2 eller at meddele prisrådet oplysninger, som er nødvendige for at rådet kan udføre sine pligter ifølge loven, kan Prisrådet pålægge den pågældende under en daglig eller ugentlig bøde, der kan inddrives ved udpantning, at opfylde sin pligt i så henseende.

§ 10. Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Sum partur av royndum landsstýrisins at tálma kostnaðarstøðinum í samfelagnum verður lagt fram uppskot til løgtingslóg um prissteðg.

Hetta lógaruppskot skal haldast saman við uppskoti til løgtingslóg um, at leingja ávísar lønarsáttmálar og avtalur.

Tá verjan móti prísvøkstri, sum liggur í at kunna samráða seg til hægri løn, er tað av týdningi á annan hátt at tryggja, at brúkarin ikki fær størri útreiðslur.

Prissteðgurin er møguligur at umsita, men fer sambært Priseftirlitinum at krevja nakað av arbeiðsorku aftrat, um eftirlitið skal vera munandi.

1. viðgerð 28. oktober 1993. Málið varð beint í arbeiðaramálanevndina, sum 3. november legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 20. oktober 1993 og eftir 1. viðgerð 28. oktober 1993 beint í arbeiðaramálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Heini Johansen, Hildur Patursson og Karl Heri Joensen) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Jógvan Ingvard Olsen og Birgir Danielsen) førir fram: Sum støðan er í landinum í løtuni, er kappingin um prísirnar sera hørð. Hetta er við til at halda prísunum niðri. Tí heldur minnilutin, at ongin orsøk er at seta í gildi lóg um prissteðg. Harafturat verður í viðmerkingunum sagt, at um eftirlitið skal muna, so skal meiri arbeiðsorka til, t.v.s. størri umsiting og størri almennar útreiðslur. Minnilutin tekur tí ikki undir við uppskotinum.

2. viðgerð 16. november 1993. Uppskotið samtykt við 17-0.

3. viðgerð 23. november 1993. Uppskotið endaliga samtykt við 17-0.

Lóg nr. 191 frá 8. desember 1993.

26 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1993, mikudagin 20. oktober legdi Finnbogi Isakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1993 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, nr. 2 verða pkt. 1, 2 og 3 sett úr gildi, og ístaðin verður sett:
"Hvør persónur, sum innan 4 ley seinastu árini hevur havt bústað her í landinum uttan so, at hann prógvar, at hann er undir skyldu at gjalda inntøkuskatt uttanlands."
Pkt. 4, 5, 6 og 7 verða hereftir pkt. 2, 3, 4 og 5.

2) Í § 33, nr. 11 verður sum nýtt 4. punktum sett:
"Skattskyldug hjún, sum búgva saman, gera sjálvi av, hvussu samlaðu útreiðslurnar sambært hesi grein skulu verða býttar teirra millum. Býtið skal lutfalsliga vera tað sama í endaligu álíkningini, sum í fyribilsáíkningini."
Í § 33, nr. 11 verður 4. punktum til 5. punktum.

3) Í § 33 verður sum nýtt nr. 12 sett:
"meirútreiðslur til kost, húsaleigu, ferða- og flutningsútreiðslur, ið skattgjaldari hevur vegna inntøkugevandi arbeiði í útlandinum, sambært hesi áseting, treytað av, at dvølurin uttanlands er vegna arbeiði, og at dvølurin uttanlands í inntøkuárinum antin er 2 mánaðir uttan avbrot ella í minsta lagi er 100

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 1, nr. 2 ophæves pkt. 1, 2 og 3 og i stedet indsættes:
"Enhver person, der indenfor de sidste 4 år har haft bopæl her i landet, medmindre han godtgør at være undergivet indkomstbeskatning udenlands."
Pkt. 4, 5, 6 og 7 bliver herefter pkt. 2, 3, 4 og 5.

2) I § 33, nr. 11 indsættes som nyt 4. punktum:
"Samlevende skattepligtige ægtefæller afgør selv, hvorledes de samlede udgifter i henhold til denne paragraf skal fordeles mellem dem. Fordelingen skal forholdsmæssigt være den samme i slutligningen, som i forskudsregistreringen."
I § 33, nr. 11 ændres 4. punktum til 5. punktum.

3) I § 33 indsættes som nyt nr. 12:
"merudgifter til kost, logi, rejse og befordringsudgifter, der påføres skatteyder i forbindelse med indtægtsgivende arbejde i udlandet efter disse regler, forudsat at den pågældende i indkomståret har haft uafbrudt ophold i udlandet i 2 måneder eller at opholdet i udlandet i løbet af indkomståret i alt har omfattet mindst 100 døgn. Fradraget for

samdøgur. Frádrátturin fyri kost og húsaleigu verður veittur sum ein samdøgurfrádráttur fyri cykaútreiðslurnar til kost og húsaleigu, meðan frádráttur fyri ferða- og flutningsútreiðslur verður veittur fyri skjalprógvaðar útreiðslur. Samdøgurfrádrátturin verður árliga ásettur av Líkningarráð Føroya. Frádrátturin eftir hesum reglum kann tó ongantíð vera størri enn skattskylduga uttanlandsinntøkan."

4) Í § 54, stk. 2 og § 64 verður "50%" broytt til: "57%".

5) Sum nýggj § 120 a verður sett:
"**§ 120 a.** Bankar, sparikassar og onnur, ið taka ímóti peningi og øðrum virðum at umsita, ella sum reka vinnu við at læna út pening, skulu eftir áheitan lata líkningarmyndugleikunum ella tí persóni, sum líkningarmyndugleikin hevur tilnevnt, allar upplýsingar um innistandandi pening, lán, goymslur ella boks hjá navngivnum persónum, tá ið tað er av týdningi fyri skattaálíkningina, at hesar upplýsingar kunnu verða útvegaðar. Soleiðis kann verða kravt, at upplýst verður um lániupphædd, innistandandi og onnur virði, sum verða umsitin og somuleiðis um tað, sum hetta gevur av sær, um flytingar á ávikavist innláns- ella útlánskonto, eisini um úttiknar og innsettar kekkar, um diskonteraðar vekslar og um trygd fyri lánum og kredittum. Viðvíkjandi ikki navngivnum kunnu eftir avgerð líkningarráðsins upplýsingar krevjast um innistandandi ella virðir, sum verða umsitin, og um tað, sum hetta gevur av sær, við upplýsing um navn á eigara ella tí, sum møguliga hevur heimild at ráða, bústað, navn á handilsbústað og upplýsingar, sum nevndir eru í § 120 b, stk. 2.
Stk. 2. Við atliti at skattligu eftiransingini við navngivnum og ikki

kost og logi gives som et døgnfradrag for ekstraudgifter til kost og logi, medens fradraget for rejse og befordringsudgifter gives for de dokumenterede rejse- og befordringsudgifter. Døgnfradraget fastsættes en gang om året af Færøernes Ligningsråd. Fradraget i henhold til disse regler kan dog aldrig være større end den skattepligtige udenlandsindkomst."

4) I § 54, stk. 2 og § 64 ændres "50%" til: "57%".

5) Som ny § 120 a indsættes:
"**§ 120 a.** Banker, sparekasser og andre, der modtager penge og andre værdier til forvaltning eller erhvervsmæssigt udlåner penge, skal efter anmodning give skattemyndighederne eller den person, som dette vælger i sit sted, alle oplysninger om navngivne personers indskud, lån, depoter eller boks, når det er af betydning for skatteligningen, at sådanne oplysninger fremskaffes. Oplysning kan således forlanges om størrelsen af lån og af indestående eller forvaltede midler og disses afkastning, om bevægelser på indskuds- eller lånekonti, herunder oplysninger om trukne og indsatte checks, om diskonterede veksler samt om sikkerhedsstillelse for lån og kreditter. For så vidt angår ikke navngivne, kan der efter ligningsrådets bestemmelse kræves oplysning om indestående eller forvaltede midler og disses afkastning med angivelse af ejerens, eventuelt tillige den dispositionsberettigedes navn, bopæl, forretningsadresse samt oplysninger som nævnt i § 120 b, stk. 2.
Stk. 2. Med henblik på skattemæssig stikprøvekontrol med navngivne og ikke navngivne personer er de skatteligningsrådets bestemmelse berettiget til

navngivnum persónum, hava líkningarmyndugleikarnir eftir nærri fyriskipan líkningarráðsins, rætt til í samstarvi við bankar, sparikassar og vekslarar, hjá hesum somu at koma á staðið og ganga ígjøgnum roknskapartilfar, fylgisskjøl og skjøl annars, sum eru nevnd í § 119, 2. stk. Við gjøgnumgongdina kunnu líkningarmyndugleikarnir tryggja sær upplýsingar, sum nevndar eru í 1. stk."

6) Sum nýggj § 120 b verður sett:

"**§ 120 b.** Bankar, sparikassar, postgiroskrivstovan og onnur, sum taka ímóti innláni til renting, skulu í sambandi við skattaálíkningina á hvørjum ári uttan at biðið verður um tað, lata líkningarmyndugleikunum upplýsingar um upphædd av latnum ella góðskrivaðum rentum til teir einstøku kontohavararnar í árinum frammanundan og upphædd av tí innistandandi við árslok í árinum frammanundan. Landsstýrið kann áseta, at samsvarandi upplýsingar skulu latast av øðrum, sum renta ognir, sum annar persónur eigur.

Stk 2. Upplýsingar, sum verða latnar eftir stk. 1, skulu innihalda kontoheiti, navnið á honum, sum eigur kontoina, bústað, persóntal ella arbeiðsgevaratal.

Stk. 3. Upplýsingarskyldan eftir stk. 1 og 2 fevnir eisini um konti v.m., sum verða uppsagdar í árinum. Fyri slíkar konti verða upplýsingar um innistandandi, tá ið kontoin verður uppsøgd, latnar.

Stk. 4. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um innlating av upplýsingum eftir stk. 1-3 og áseta freist fyri innlating av nevndu upplýsingum. Tá ið praktisk viðurskifti tala fyri, og upplýsingin hevur minni týdning fyri skattaeftirsingina, kann landsstýrið frítaka fyri ella staka upplýsingarskylduna eftir stk. 1-3 fyri einstakar

hos banker, sparekasser og vekselerere i samarbejde med disse at foretage gennemgang på stedet af regnskabsmateriale, bilag og dokumenter som nævnt i § 119, stk. 2. Ved gennemgangen kan de skattelignende myndigheder sikre sig oplysninger som nævnt i stk. 1."

6) Som ny § 120 b indsættes:

"**§ 120 b.** Banker, sparekasser, postgirokontoret og andre, der modtager indskud til forrentning, skal til brug ved skatteligningen hvert år uden opfordring give ligningsmyndighederne oplysning om størrelsen af ydede eller godskrevne renter til de enkelte kontohavere i det foregående år, samt størrelsen af det indestående beløb ved udløbet af det foregående år. Landsstyret kan bestemme, at tilsvarende oplysninger skal afgives af andre, der i øvrigt forrenter midler tilhørende en anden person.

Stk. 2. Indberetning efter stk. 1 skal indeholde oplysning om kontobetegnelse, kontohaverens navn, adresse, personnummer eller arbejdsgivernummer.

Stk. 3. Oplysningspligten efter stk. 1 og 2 omfatter også konti m.v., der ophæves i løbet af året. For sådanne konti indberettes indestående ved ophævelsen.

Stk. 4. Landsstyret kan fastsætte nærmere regler om afgivelsen af oplysninger efter stk. 1 - 3 og fastsætte en frist for afgivelsen af de nævnte oplysninger. Når praktiske forhold taler derfor, og oplysningen har mindre betydning for skattekontrollen, kan landsstyret fritage for eller lempe oplysningspligten efter stk. 1-3 for enkelte eller grupper af oplysningspligtige eller for visse kontoarter, ligesom det kan fastsætte en mindstegrænse for de beløb, der skal indberettes.

ella bólkar av upplýsingarskyldugum ella fyri ávís kontosløg á sama hátt, sum tað kann áseta eitt minsta mark fyri tær upphæddir, sum skulu fráboðast.

Stk. 5. Tann upplýsingarskyldugi skal geva kontohavaranum boð um støddd á teimum upphæddum, sum skulu fráboðast eftir stk. 1, smbr. stk. 4. Landsstýrið kann áseta, at fráboðanin til kontohavaran eisini skal innihalda upplýsingar viðvíkjandi serligum eigaraviðurskiftum til kontoina. Fráboðan til kontohavaran skal gerast innan 1. februar í árinum aftaná tað álmanakkaárið, sum upplýsingarnar viðvíkja.

Stk. 6. Landsstýrið ásetur nærri reglur fyri konti, sum eru nevndar í stk. 1., og sum hoyra til persónar, sum hava bústað ella tilhald uttanlands."

7) Sum nýggj § 120 c verður sett:

"**§ 120 c.** Tann, sum stovnar konto sambært § 120 b, stk. 1, skal upplýsa persóntalið hjá kontohavaranum ella arbeiðsgevaratal, somuleiðis eftir landsstýrisins nærri ásetan geva aðrar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at vita, hvør kontohavarin er. Um kontohavarin hvørki hevur persóntal ella arbeiðsgevaratal, kann landsstýrið áseta nærri reglur um, hvørjar upplýsingar skulu latast.

Stk. 2. Eftir reglum, sum landsstýrið ásetur, skal tann, sum stovnar konto sambært stk. 1., prógva sannleikan av teimum givnu upplýsingum.

Stk. 3. Fyri at stovna eina konto sambært § 120 b, stk. 1, krevst, at viðkomandi hevur latið tær upplýsingar og prógv, sum nevnd eru í stk. 1 og 2.

Stk. 4. Verða tær í stk. 1 nevndu upplýsingar broyttar, sum eru neyðugar til at gera av, hvør ið kontohavarin er, skal hesin eftir

Stk. 5. Den oplysningspligtige skal underrette kontohaveren om størrelsen af de beløb, der skal indberettes efter stk. 1, jfr. stk. 4. Landsstyret kan bestemme, at underretningen til kontohaveren også skal indeholde meddelelser vedrørende særlige ejerforhold til kontoen. Underretning til kontohaveren skal ske senest den 1. februar i året efter det kalenderår, oplysningen vedrører.

Stk. 6. For konti som nævnt i stk. 1 tilhørende personer, der er bosat eller opholder sig i udlandet, fastsætter landsstyret nærmere regler."

7) Som ny § 120 c indsættes:

"**§ 120 c.** Den, der opretter konto som nævnt i § 120 b, stk. 1, skal oplyse kontohavers personnummer eller arbejdsgivernummer samt efter landsstyrets nærmere bestemmelse give andre oplysninger, der er nødvendige til identifikation af kontohaver. Hvis kontohaveren hverken har personnummer eller arbejdsgivernummer, kan landsstyret fastsætte nærmere regler om, hvilke oplysninger, der skal gives.

Stk. 2. Efter regler der fastsættes af landsstyret, skal den, der opretter konto som nævnt i stk. 1, godtgøre rigtigheden af de givne oplysninger.

Stk. 3. En konto, som nævnt i § 120 b, stk. 1, kan ikke oprettes, før den, der ønsker at oprette kontoen, har meddelt de i stk. 1 og 2 nævnte oplysninger og bevisligheder.

Stk. 4. Ændres de i stk. 1 nævnte oplysninger, der er nødvendige til identifikation af kontohaver, skal denne efter nærmere af landsstyret fastsatte regler underrette den oplysningspligtige efter § 120 b om ændringen."

8) Som ny § 120 d indsættes:

"**§ 120 d.** Ligningsrådet kan meddele den oplysningspligtige de oplysninger, der er nødvendige til op-

nærri reglum, ásettar av landsstýrinum, geva tí upplýsingarskylduga boð smbr. § 120 b um broytingina."

8) Sum nýggj § 120 d verður sett:
"**§ 120 d.** Líkningarráðið kann lata teimum upplýsingarskylduguneyðugar upplýsingar til tess at tryggja, at fráboðanarskyldan sambært §§ 120 b, 120 h og 120 j kann fremjast."

9) Sum nýggj § 120 e verður sett:
"**§ 120 e.** Líkningarráðið kann skráseta tey, sum hava upplýsingarskyldu sambært §§ 120 b, 120 h og 120 j. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um skránna og um skyldu til at lata seg skráseta. **Stk. 2.** Líkningarráðið hevur heimild til at tvinga skrásetingvið at leggja á dagliga sekt."

10) Sum nýggj § 120 f verður sett:
"**§ 120 f.** Teir, sum hava upplýsingarskyldu eftir §§ 120 b, 120 h og 120 j skulu leggja teirra roknskapir soleiðis til rættis, at tær upplýsingar, sum eru latnar sambært nevndu greinir kunnu sammanberast við roknskapirnar.
Stk. 2. Teir, sum hava upplýsingarskyldu, skulu eftir áheitan senda inn roknskapartilfar ella annað skjalprógv, ið hevur verið nýtt sum grundarlag fyri teimum upplýsingum, sum latnar eru líkningarmyndugleikunum. Líkningarráðið kann á staðnum kanna nevnda roknskapartilfar og onnur skjalprógv."

11) Sum nýggj § 120 g verður sett:
"**§ 120 g.** Konti hjá persónum, sum nevndir eru í § 3, stk. 1 litra a, b, c, e og f, eru undantiknar reglunum í §§ 120 b - 120 d og §§ 120 h - 120 k.
Stk. 2. Eftir reglum, sum verða ásettar av landsstýrinum, koma konti hjá útlendskum umboðum, ið koma undir § 3, stk. 1, litra d, í hesi løgtingslóg, ikki undir reglurnar í §§ 120 b -120 d, og §§ 120 h - 120 k."

12) Sum nýggj § 120 h verður sett:

fyldelse af indberetningspligten efter §§ 120 b, 120 h, og 120 j."

9) Som ny § 120 e indsættes:
"**§ 120 e.** Ligningsrådet kan føre register over oplysningspligtige som nævnt i §§ 120 b, 120 h og 120 j. Landsstyret fastsætter nærmere regler om dette register og om pligten til at tilmelde dette.
Stk. 2. Tilmeldelse til registret kan fremtvinges ved pålæg af dagligc bøder, der fastsættes af ligningsrådet."

10) Sum nýggj § 120 f verður sett:
"**§ 120 f.** De oplysningspligtige efter §§ 120 b, 120 h, og 120 j, skal tilrettelægge deres regnskaber således, at de afgivne oplysninger i henhold til nævnte bestemmelser kan afstemmes med regnskabsføringen.
Stk. 2. De oplysningspligtige skal på forlangende indsende regnskabsmateriale eller anden dokumentation, som har tjent som grundlag for indberetningerne til ligningsmyndighederne. Ligningsrådet kan på stedet gennemgå det regnskabsmateriale og anden dokumentation, som har tjent som indberetningsgrundlag."

11) Som ny § 120 g indsættes:
"**§ 120 g.** Konti tilhørende personer som nævnt i § 3, stk. 1, litra a, b, c, e og f, er undtaget fra reglerne i §§ 120 b-120 d og §§ 120 h-120 k.
Stk. 2. Efter regler, der fastsættes af landsstyret undtages konti tilhørende udenlandske repræsentationer og udenlandske statsborgere, der omfattes af den i stk. 1 nævnte § 3, stk. 1, litra d, fra reglerne i §§ 120 b-120 d og §§ 120 h-120 k."

12) Som ny § 120 h indsættes:
"**§ 120 h.** Banker, sparekasser Føroya Ídnaðargrunnur, Færøernes Realkreditinstitut, Húsalánsgrunnurin, Jarðargrunnurin, Menningargrunnur Ídnaðarins, P/F Húsalán, forsikringsselskaber og andre, der

"§ 120 h. Bankar, sparikassar, Føroya Ídnaðargrunnur, Færøernes Realkreditinstitut, Húsalánsgrunnurin, Jarðargrunnurin, Menningargrunnur Ídnaðarins, P/f Húsalán, tryggingarstovur og onnur, sum sjálvi ella vegna onnur læna út pening ímóti renting, skulu í sambandi við skattaálíkningina á hvørjum ári, uttan at biðið verður um tað, lata teir í stk. 2 nevndu upplýsingar til líkningarmyndugleikarnar. Landsstýrið kann áseta, at gjaldskortútskrivarar og onnur, sum læna pening út á samsvarandi hátt, hava upplýsingarskyldu.

Stk. 2. Fráboðanin skal innihalda upplýsingar til sannan av lántakara og upplýsingar um konto- og lániviðurskifti. Fyri tað einstaka lánið skal upplýsast

1) slag av láni,
2) tilskrivaðar ella falnar rentur,
3) provisiónir v.m.,
4) skuld pr. 31. desember og
5) upplýsingar, sum landsstýrið sambært 3. stk. krevur.

Stk. 3. Landsstýrið ásetur nærri reglur fyri tær upplýsingar, sum skulu fráboðast og um mannagongd og freist v.m. fyri fráboðanini. Tá ið praktisk viðurskiftir tala fyri tí, og upplýsingarnar hava minni týdning fyri skattaeftiransingina, kann landsstýrið frítaka fyri ella slaka upplýsingarskylduna. Landsstýrið kann áseta serligar reglur um fráboðan um lán til lántakarar, sum hava bústað ella tilhald uttanlands.

Stk. 4. Um gjaldingarnar viðvíkja útlánum, sum verða umsitin av einum, sum hevur upplýsingarskyldu smbr. § 120 j er fráboðanarskyldan eftir stk. 1 ikki galdandi.

Stk. 5. Tann, sum hevur upplýsingarskyldu, skal innan 1. februar í árinum aftaná álmanakkaárið, sum upplýsingarnar viðvíkja, boða lántakara frá, hvussu nógv hann hevur goldið í rentum og provisiónum v.m. í árinum undan. Tann, sum hevur upplýsingarskyldu, skal eisini boða lántakara frá, hvussu nógv hann skuldar 31. desember. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um, hvussu upplýsingarnar skulu latast lántakara.

Stk. 6. Tann, sum brýtur stk. 1-5 ella reglur, sum eru settar við heimild í teimum, verður revsaður við sektum, nema hægri revsing er fyrigjørd í øðrum lógum."

som led i deres virksomhed yder eller formidler udlån mod forrentning, skal til brug ved skatteligningen hvert år uden opfordring indberette de i stk. 2 nævnte oplysninger til ligningsmyndighederne. Landsstyret kan bestemme, at betalingskortudstedere og andre, der yder eller formidler udlån på tilsvarende måde, er omfattet af oplysningspligten.

Stk. 2. Indberetningen skal indeholde oplysninger til identifikation af låntager og oplysninger om konto og låneforholdet. For det enkelte låneforhold skal oplyses:

1) lånetype,
2) tilskrevne eller forfaldne renter,
3) løbende provisioner m.v.,
4) gæld pr. 31.december og
5) oplysninger, som landsstyret fordrer efter stk. 3.

Stk. 3. Landsstyret fastsætter nærmere regler om de oplysninger, der skal indberettes, og om fremgangsmåde og frist m.v. for indberetningen. Når praktiske forhold taler derfor og oplysningen har mindre betydning for skattekontrollen, kan landsstyret fritage for eller lempe oplysningspligten. Endvidere kan landsstyret fastsætte særlige regler om indberetning for lån til låntagere, der er bosat eller opholder sig i udlandet.

Stk. 4. Hvis betalingerne vedrørende udlån forvaltes af en oplysningspligtig efter § 120 j gælder indberetningspligten efter stk. 1 ikke.

Stk. 5. Den oplysningspligtige skal inden 1. februar i året efter det kalenderår, oplysningen vedrører, underrette låntageren om de indberettede oplysninger. Landsstyret kan bestemme, at underretninger skal indeholde andre oplysninger om lånet."

13) Som ny § 120 j indsættes:

aranum frá, um tær fráboðaðu og innlatnu upplýsingarnar. Landsstýrið kann áseta, at fráboðanin skal innihalda aðrar upplýsingar um lánið."

13) Sum nýggj § 120 j verður sett:

"**§ 120 j.** Bankar, sparikassar og onnur, sum taka ímóti pantibrøvum við panti í fastari ogn í varðveitslu til at umsita, skulu í sambandi við skattaálíkningina á hvørjum ári, uttan at biðið verður um tað, lata teir í stk. 2 nevndu upplýsingar til líkningarmyndugleikarnar.

Stk. 2. Fráboðanin skal innihalda upplýsingarnar til sannan av ávikavist lántakara og goymsluhavara og goymsluni umframt upplýsingar um lánið. Fyri tann einstaka lántakaran og goymsluhavaran skal upplýsast:

1) tilskrivaðar ella gjaldkomnar rentur,
2) restskuld pr. 31. desember og
3) áljóðandi virði av restskuld pr. 31. desember.

Stk. 3. Landsstýrið ásetur reglur um tær upplýsingar, sum skulu latast, og um mannagongd og freist v.m., fyri fráboðanina. Tá ið viðurskiftini tala fyri, og upplýsingarnar hava minni týdning fyri skattaeftiransingina, kann landsstýrið slaka ella lata vera at krevja upplýsingar. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um fráboðan fyri lántakara og goymsluhavara, sum hava bústað ella tilhald uttanlands.

Stk. 4. Tann, sum hevur upplýsingarskyldu, skal innan 1. februar í árinum aftaná tað álmanakkaárið upplýsingarnar viðvíkja, fráboða lántakaranum og goymsluhavaranum um latnu upplýsingarnar. Landsstýrið kann áseta, at fráboðanin skal innihalda aðrar upplýsingar um tey pantibrøv, sum liggja á goymslu."

14) Sum nýggj § 120 k verður sett:

"**§ 120 k.** Tann, sum er lántakari ella hevur eina goymslu, sum kemur

"**§ 120 j.** Banker, sparekasser og andre, der som led i deres erhverv modtager pantebreve med pant i fast ejendom i depot til forvaltning, skal til brug ved skatteligningen hvert år uden opfordring indberette de i stk. 2 nævnte oplysninger til ligningsmyndighederne.

Stk. 2. Indberetningen skal indeholde oplysninger til identifikation af såvel låntager og depothaver som depotet samt oplysninger om låneforholdet. For den enkelte låntager og depothaver skal oplyses:

1) tilskrevne eller forfaldne renter,
2) restgæld pr. 31. december og
3) den pålydende værdi af restgæld pr. 31. december.

Stk. 3. Landsstyret fastsætter nærmere regler om de oplysninger, der skal indberettes, og om fremgangsmåde og frist m.v. for indberetningen. Når praktiske forhold taler derfor og oplysningen har mindre betydning for skattekontrollen, kan landsstyret fritage for eller lempe oplysningspligten. Endvidere kan landsstyret fastsætte særlige regler om indberetning for låntagere og depothavere, der er bosat eller opholder sig i udlandet.

Stk. 4. Den oplysningspligtige skal inden 1. februar i året efter det kalenderår, oplysningen vedrører, underrette låntageren og depothaveren om de indberettede oplysninger. Landsstyret kan bestemme, at underretningen skal indeholde andre oplysninger om de deponerede pantebreve."

14) Som ny § 120 k indsættes:

"**§ 120 k.** Den, der er låntager eller har et depot, der er omfattet af § 120 h eller § 120 j, skal til de oplysningspligtige give oplysninger, herunder om personnummer til identifikation af låntager eller depothaver, som er nødvendige til opfyldelse af

undir § 120 h ella § 120 j, skal lata teimum, sum hava upplýsingarskyldu, tær upplýsingar, herundir persóntal, til sannan av lántakara ella goymsluhavara, sum eru neyðugir til tess at lúka fráboðanarskylduna, umframt at sanna, at tær upplýsingar, ið eru latnar, eru beinar. Landsstýrið ásetur nærri reglur um hetta.

Stk. 2. Um broytingar fara fram í teimum í stk. 1 nevndu viðurskiftum, skal boðast frá til tann, sum hevur upplýsingarskyldu, um broytingarnar.

Stk. 3. Eitt lán sambært § 120 h, kann bert stovnast um tær í 1. stk. nevndu upplýsingar verða lætnar. Yvirtøka av láni verður javnsett við stovnan av láni. Ein goymsla, sum nevnd í § 120 j, kann bert stovnast, um tann, sum stovnar goymsluna, letur tær í stk. 1 nevndu upplýsingar um, hvør goymsluhavarin er."

15) § 120 l verður sett:

"**§ 120 l.** Ber nakar seg undan at ganga undir ásetingunum í § 120 h, stk. 1-3 ella § 120 e, § 120 h, stk. 1, § 120 j, stk. 1, ger landsstýrið av, um viðkomandi er skyldugur at gera tað, og kann um neyðugt tvinga hesa skyldu ígjøgnum við at áleggja dagliga sekt."

16) Sum nýggj § 120 m verður sett:

"**§ 120 m.** Upplýsingar um persóntal, sum ein privatur vinnurekandi v.m. hevur móttikið sambært § 120 c, stk. 1, § 120 d ella § 120 k, mugu ikki gevast víðari til onnur, uttan so at hetta verður mett neyðugt, fyri at tann vinnurekandi kann røkja sínar uppgávur fyri líkningarráðið. Landsstýrið kann, eftir at tað hevur biðið skrásetingareftirlitið um ummæli, gera frávik frá 1. punktum."

17) § 120 a verður hereftir § 120 n.

indberetningspligten samt godtgøre rigtigheden af de afgivne oplysninger. Landsstyret fastsætter nærmere regler herom.

Stk. 2. Hvis der sker ændringer i de i stk. 1 nævnte forhold, skal der gives meddelelse til den oplysningspligtige om ændringerne.

Stk. 3. Et lån som nævnt i § 120 h kan kun etableres, hvis der gives de i stk. 1 nævnte oplysninger. Overtagelse af lån sidestilles med etablering af lån. Et depot som nævnt i § 120 j kan kun oprettes, hvis den, der opretter depotet, giver de i stk. 1 nævnte oplysninger om depothaverens identitet."

15) Som ny § 120 l indsættes:

"**§ 120 l.** Vægrer nogen sig ved at efterkomme bestemmelserne i § 120 b, stk. 1-3, § 120 e, § 120 h, stk. 1, § 120 j, stk. 1, afgør landsstyret, hvorvidt han er pligtig dertil, og kan om fornødent fremtvinge pligtens efterkommelse ved pålæg af en daglig bøde.

16) Som ny § 120 m indsættes:

"**§ 120 m.** Oplysninger om personnumre, som en privat erhvervsdrivende m.v. har modtaget i medfør af § 120 c, stk. 1, § 120 d eller § 120 k, må ikke videregives til andre ud over, hvad der må anses for påkrævet til varetagelse af den erhvervsdrivendes opgaver for skattemyndighederne. Landsstyret kan efter indhentet udtalelse fra personregistreringsrådet gøre undtagelse fra bestemmelsen i 1. pkt."

17) § 120 a bliver herefter § 120 n.

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Broyting nr. 1 og 4 fáa gildi 1. jan. 1994. Broyting nr. 1 er galdandi fyri flytingar frá og við hesum degi. Broytingin í nr. 4 um hækking av skattahámarkinum úr 50% í 57% verður bert galdandi í 1994 og frá og við 1. januar 1995 verða "50%" broytt til: "55%".

Stk. 3. Broytingarnar nr. 5-17 fáa gildi fyri rentur av konti í peningastovnum v.m., tilskrivaðar ella góðskrivaðar aftaná 31. desember 1993, somuleiðis innistandandi á somu konti pr. 31. desember 1993 og seinni ár samanber stk. 12, 13 og 14.

Stk. 4. Landsstýrið kann áseta serligar avmarkingar í upplýsingarskylduni viðvíkjandi rentum, sum eru tilskrivaðar ella góðskrivaðar í 1994, somuleiðis innistandandi á konti við árslok 1993.

Stk. 5. Fyri tær konti, sum vóru tá henda løgtingslóg kom í gildi, skal í seinasta lagi 31. desember 1993 gerast skráseting av persóntali ella arbeiðsgevaratali v.m., sum nevnt í § 120 c í hesi løgtingslóg.

Stk. 6. Tá ið tann í stk. 5 nevnda freist er farin, skal ongin flyting fara fram av konti, har skráseting av persóntali ella arbeiðsgevaratali er ikki gjørd.

Stk. 7. Fyri konti hjá persónum, sum eru búsitandi ella hava tilhald uttanlands, ásetir landsstýrið nærri reglur.

Stk. 8. Landsstýrið kann áseta, at bankar og sparikassar o.a., sum koma undir upplýsingarskylduna smbr. § 120 b í hesi løgtingslóg, skulu senda líkningarráðnum yvirlit yvir innlánskonti, tá ið tann í stk. 4 nevnda freist er farin, og ongin skráseting av persóntali ella arbeiðsgevaratali v.m. er gjørd. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um, hvørjar upplýsingar skulu latast í yvirlitinum.

Stk. 9. Innistandandi á konti, sum er við á tí í 8. stk. nevnda yvirliti, og sum líkningarmyndugleikarnir hava ikki verið førir fyri at ávíst til teir veruligu eigarar-

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Stk. 2. Ændring nr. 1) og 4) træder i kraft 1. januar 1994. Ændring nr. 1) gælder for flytning fra og med denne dag. Ændringen i nr. 4 vedrørende forhøjelsen af skatteloftet fra 50% til 57% er kun gældende i 1994. Fra og med 1. januar 1995 ændres "50%" til: "55%".

Stk. 3. Ændringerne nr. 5-17 finder anvendelse på renter af konti i pengeinstitutter m.v., der ydes eller godskrives efter den 31. december 1993, samt indestående på samme konti pr. 31. december 1993 og senere år jfr. stk. 12, 13 og 14.

Stk. 4. Landsstyret kan fastsætte særlige begrænsninger i oplysningspligten vedrørende renter, der er ydet eller godskrevet i 1994, samt vedrørende indestående på konti ved udløbet af 1993.

Stk. 5. For de ved lovens ikrafttræden eksisterende konti skal der senest den 31. december 1993 foretages notering af personnummer eller arbejdsgivernummer m.v. som nævnt i § 120 c.

Stk. 6. Efter udløbet af den i stk. 5 nævnte frist må der ikke foretages udtræk på konti, for hvilke notering af personnummer eller arbejdsgivernummer m.v. ikke er foretaget.

Stk. 7. For konti tilhørende personer, der er bosat eller opholder sig i udlandet, fastsætter landsstyret nærmere regler.

Stk. 8. Landsstyret kan bestemme, at banker, sparekasser og andre, der er omfattet af oplysningspligten efter § 120 b, skal tilsende ligningsrådet fortegnelse over indskudskonti, for hvilke der efter udløbet af den i stk. 4. fastsatte frist ikke er foretaget notering af personnummer eller arbejdsgivernummer m.v. Landsstyret kan fastsætte nærmere regler om, hvilke oplysninger, der skal gives i fortegnelsen.

Stk. 9. Indestående på konti, som er opført på den i stk. 8 nævnte fortegnelse, og som de skatteligningende myndigheder ikke

nar, kann landskassin leggja hald á.

Stk. 10. Skyldan at geva líkningarráðnum upplýsingar um lán og pantibrøv, sum eru sett í goymslu smbr. §§ 120 h og 120 j, er galdandi fyri rentur v.m., sum verða tilskrivaðar ella eru falnar til gjaldingar aftaná 31. desember 1993. Skuld og áljóðandi virði av hesum skal verða innlatið fyrstu ferð pr. 31. desember 1993.

Stk. 11. Landsstýrið kann fyri ávís upplýsingarskyldug smbr. §§ 120 h og 120 j áseta, at innlatingarskyldan bert skal galda rentur v.m., sum verða tilskrivaðar ella falla til gjaldingar seinni enn ásett í 10. stk. og at skuld og áljóðandi virði fyrstu ferð skal latast inn seinni enn nevnt í 10. stk. Um serligar umstøður tala fyri tí, kann landsstýrið harumframt áseta, at skyldan at lata inn smbr. § 120 j er ikki galdandi fyri álmanakkaárið 1993.

Stk. 12. Reglurnar um upplýsingarskyldu smbr. § 120 b í skattalógini fáa fyrstu ferð gildi fyri rentur, sum verða tilskrivaðar ella góðskrivaðar aftaná 31. desember 1993 og fyri seinni ár. Fráboðan um innistandandi skal fyrstu ferð latast um innistandandi við árslok í 1993, og fyri seinni ár verður upplýst eftir reglunum í skattalógini.

Stk. 13. Reglurnar um innlatingarskyldu, samanber §§ 120 h og 120 j í skattalógini fyri rentur v.m., sum verða tilskrivaðar ella falla til gjaldingar aftaná 31. desember 1993 og seinni ár. Fráboðan um skuld og áljóðandi skal fyrstu ferð latast inn pr. 31. desember 1993 og fyri seinni ár verður upplýst eftir reglunum í skattalógini.

Stk. 14. Upplýsingar sambært §§ 120 b, 120 h og 120 j í skattalógini, samanber eisini stk. 12 og stk. 13 skulu latast líkningarráðnum innan 20. januar. Upplýsingarnar um saldo pr. 31. desember 1993 skulu latast líkningarráðnum fyrstu ferð innan 20. januar 1994, og upplýsingarnar um rentur skulu fyrstu ferð latast líkningarráðnum innan 20. januar 1995.

har kunnet henføre til de virkelige ejere, kan inddrages til fordel for landskassen.

Stk. 10. Pligten til at give ligningsrådet oplysninger om lån og deponerede pantebreve efter § 120 h og § 120 j gælder for renter m.v., der tilskrives eller forfalder efter den 31. december 1993. Gæld og pålydende værdi heraf skal indberettes første gang pr. 31. december 1993.

Stk. 11. Landsstyret kan for visse oplysningspligtige efter § 120 h og § 120 j bestemme, at indberetningspligten kun skal omfatte renter m.v., der tilskrives eller forfalder på et senere tidspunkt end anglvet i stk. 10, og at gæld og pålydende værdi første gang skal indberettes for et senere tidspunkt end angivet i stk. 10. Hvis særlige forhold taler derfor, kan landsstyret endvidere bestemme, at indberetningspligten efter § 120 j ikke gælder for kalenderåret 1993.

Stk. 12. Reglerne om oplysningspligt, jf. § 120 b i skatteloven, træder første gang i kraft for renter, der tilskrives eller godskrives efter 31. december 1993 og for senere år. Oplysning om indestående skal første gang indleveres ultimo 1993, og for senere år oplyses efter reglerne i skatteloven.

Stk. 13. Reglerne om oplysningspligt, jf. §§ 120 h og 120 j i skatteloven, får virkning for renter m.v., der tilskrives eller forfalder til betaling efter 31. december 1993 og senere år. Oplysning om gæld og saldo skal første gang indleveres pr. 31. december 1993, og for senere år oplyses efter reglerne i skatteloven.

Stk. 14. Oplysninger i henhold til §§ 120 b, 120 h og 120 j i skatteloven, jf. også stk. 12 og stk. 13, skal indleveres til ligningsrådet senest 20. januar. Oplysningerne om saldo pr. 31. december 1993 skal første gang indleveres til ligningsrådet senest 20. januar 1994 og oplysningerne vedrørende renter skal første gang indleveres til ligningsrådet senest 20. januar 1995.

Viðmerkingar:
Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins til broytingar í skattalóggávuni verða fyrst og fremst gjørdar við tí endamálið at dagføra verandi lóggávu, so hon svarar til tíðarinnar krøv, eins og roynt verður at útbyggja eitt neyvari skattaeftirlit og eina munadyggari skattaálíkning.

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins er uppskot til ígildissetting av teim upplýsingarreglum, ið sum kunnugt áður hava verið í gildi í tíðarskeiðnum frá mai.1987 til apríl 1992, tó uttan at lógin fekk tað tilætlaða árinið. Landsstýrið metir tó, at tíðin hevur vist, at hesar reglur eru alneyðugar, um skattaálíkningin og onnur almenn umsiting, ið sambært lóg skal nýta upplýsingar frá skattavaldinum, t.d. almannumsitingin, í framtíðini, skal kunna vera umsitin á ein forsvarligan hátt.

Fyri at tryggja eina munadyggari skattaálíkning og neyvari skattaeftirlit verður skotið upp, at peningastovnar, postgirostovan og onnur, sum taka móti peningi til renting og/ella læna pening út móti renting, av teirra eintingum skulu lata líkningarmyndugleikunum upplýsingar um innistandandi og árliga rentu av innistandandi eins og árliga rentuútreiðslur og saldo á útlánskonti.

Ein tílík skipan ber í sær eina sjálvvirkandi flyting av upplýsingum úr peningastovnum o.ø. til líkningarvaldið.

Sjálvvirkandi skipanin merkir eina skjótari og rættari álíkning av løntakarunum. Samtíðis ber hon í sær, at ein stórur partur av arbeiðsmegini hjá líkningarvaldinum, sum í dag fæst við løntakaraálíkning, kann setast til líkning av B-inntøkum og feløgum. Afturat hesum kemur, at líkningin av B-inntøkum gerst lættari, tá upplýsingar um inntøku- og ognarviðurskifti altíð verða tøk hjá skattavaldinum og ikki sum nú er, verða at umbiðja frá peningastovnunum í hvørjum einstøkum føri.

Skipanin er ein fyrimunur hjá A-skattgjaldarum, tí teir nýtast hvørki at hugsa um fyribils ella endaliga skráseting av rentuútreiðslum.

Eisini verður tað lættari hjá skattgjaldarum at útfylla ognaruppgerðina, tí sum er, fáa skattgjaldarar ikki nakað yvirlit yvir, hvussu nógv stendur inni við ársenda, uttan so at teir sjálvir biðja um tað. Tá ið ognaruppgerðirnar skulu skrivast eru banka- ella sparikassabøkurnar ikki dagførdar og tørir hetta sostatt ofta við sær, at ognaruppgerðirnar verða ófullfíggjaðar. Samanumtikið eru stórir fyrimunir við einari sjálvvirkandi skipan fyri bæði skattavaldið og skattaborgaran.

Vert er at leggja til merkis, at tær upplýsingar, sum skattavaldið á henda hátt kemur at fáa úr peningastovnunum um tann einstaka skattaborgaran, eru tær somu, sum skattaborgarin eftir galdandi reglum sjálvur hevur skyldu at lata líkningarmyndugleikunum á sjálvuppgávu og ognaruppgerð.

At enda kann vísast á, at tílíkar skipanir eru í okkara grannalondum og virka uttan stórvegis trupulleikar og mótstøðu.

At enda skal nevnast, at landsstýrið væntar ikki, at broytingarnar í skattalógunum, sum nú eru lagdar fram, fara at kosta landskassanum pening. Tá ið endamálið við hesum

uppskotinum, sum nevnt, er at gera regiur, sum bera í sær munadyggari skattaálíkning og neyvari skattaeftirlit, væntar landsstýrið hinvegin, at broytingarnar við tíðini fara at geva landskassanum nakað av meirinntøku.

Harumframt inniheldur lógaruppskotið broyting av skattahámarkinum, so at hetta í 1994 verður hækkað frá verandi 50 % til 57 %. Hækkingin hevur samband við fyrliggjandi uppskot til broytingar í ásetingarlógini viðv. skattastiganum, har hesin nú verður broyttur, so tann cykaskattur, ið hevur verið galdandi í tvey ár nú við ávísum broytingum, sí viðmerkingar í lógaruppskotinum um broyting í ásetingarlógini, verður ein innroknaður partur av skattastiganum.

Í roynd og veru hevur tað ikki verið talan um 50% skattaloft seinastu 2 árini, orsakað av sonevnda cykaskattinum. Veruliga skattaloftið hevur ligið frá 50% og upp ímóti 50% + hægsta cykaskattastigið, alt eftir, hvussu stór inntøkan hevur verið (fyri 1993: 50% + 5,5% = 55,5%).

Hækkingin til 57% verður tó bert galdandi í 1994 og frá og við 1. januar 1995 verður hámarkið sett til 55%.
Mælt verður til, at reglurnar um upplýsingarskyldu fáa gildi fyri rentur, sum verða tilskrivaðar ella góðskrivaðar aftaná 31. desember 1993 og seinni ár. Fráboðan um innistandandi í bankum og sparikassum v.m. skal fyrstu ferð latast um innistandandi við árslok í 1993. Annars verður vist til gildiskomureglurnar og viðmerkingarnar niðanfyri.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar:

1) Broytingin nr. 1. er broyting í reglunum fyri skattskyldu eftir § 1. Broytingin inniheldur eina nágreining av § 1, nr. 2 og bústaðartreytunum í sambandi við flyting í samsvar við tí tulkan og mannagongd, ið hevur verið galdandi hesum viðv. í mong ár. Harumframt viðførir broytingin, at persónar ikki kunnu verða fríkaknir fyri skattskyldu í Føroyum bert við at kunna sanna, at teir eru undir skattskyldu eftir reglunum sum fyri búsitandi í øðrum landi, tá teir í roynd og veru hava bústað og familju sína í Føroyum, t.d. verða føroyingar, ið sigla við grønlendskum skipum, men sum hava bústað í Føroyum, skattskyldugir í Føroyum. Reglurnar verða eisini hervið líkar skatta- flytingarreglunum í grannalondum okkara, og skulu tryggja, at allir teir persónar, sum í roynd og veru búgva í Føroyum, eisini eru undir fullari skattskyldu her.

   Broytingin kemur í gildi 1. januar 1994 og hevur gildi fyri flytingar frá og við hesum degi. Í teim førum har fulla skattskyldan longu er slept eftir verandi reglum, verður eingin broyting í skattastøðuni hjá viðkomandi, uttan so at hesin aftur verður mettur, at hava stovnað skattskyldu í Føroyum m.a. við at hava bústað her í 1994 ella seinni.

2) Grein 33 nr. 11) varð sett inn í skattalógina við løgtingslóg nr. 112 frá 21. mai 1993, og er seinni broytt við lóg nr. 158 frá 5. august 1993, og er her gjørd heimild fyri at draga frá ávísar útreiðslur í skattskyldugu inntøkuni undir nærri treytum, ið hava samband við umvæling og umbygging av egnum bústaði, og verður í hesum sambandi vist til viðmerkingarnar til nevndu lógir.

Skotið verður upp, at skattskyldug hjún, sum búgva saman, sjálvi kunnu gera av, hvussu tey býta samlaðu útreiðslurnar, ið tey kunnu draga frá sambært hesi grein. Broytingin kemur í gildi tá lógin er lýst.

3) Í broyting nr. 3 verður skotið upp, at skapa heimild fyri at føroyingar undir fullari skattskyldu, men sum arbeiða í útlandinum í longri tíðarskeið, og tí sum grundarlag fyri skattaútrokningini í Føroyum hava ein týðandi part sum uttanlanda inntøku, fáa heimild at draga frá ymiskar meirútreiðslur í sambandi við arbeiði. Her verður serliga hugsað um ferða- og flutningsútreiðslur til og frá Føroyum og arbeiðspláss, hóast serliga reglan fyri ferðafrádrátt annars varð sett úr gildi pr. 1.januar 1993. Landsstýrið metir, at hesar útreiðslur í slíkum førum sum her umrøtt eiga at verða frádráttarheimilaðar út frá teim serligu viðurskiftum, ið gera seg galdandi fyri slíkar inntøkubólkar. Fyritreytin er sjálvsagt, at løntakarin sjálvur hevur avhildið útreiðslurnar. Eisini meirútreiðslur til kost og húsalciga eiga at kunna frádragast, eftir serligum reglum. Líkningarráðið ger neyvari reglur fyri frádráttarupphæddina og umsitingina av hesum. Neyðugt er at fáa ásettar upphæddir longu nú í 1993 sum galdandi fyri útreiðslur avhildnar eftir at lógarbroytingin kemur í gildi.

4) broytingarnr í nr. 4 eru hækkingar av áðurnevnda hámarkið frá verandi 50% til 57% í 1994 og frá og við 1. januar 1955 til 55%.

5) § 120 a: Eftir hesari grein skulu bankar, sparikassar v.m., sum taka ímóti peningi og øðrum virðum til umsiting ella vinnuliga læna pening út, eftir áheitan lata líkningarráðnum allar upplýsingar um innistandandi pening, lán goymslur ella boks hjá navngivnum persónum, tá ið tað hevur týdning fyri skattaálíkningina, at hesir upplýsingar kunnu útvegast. Soleiðis kunnu upplýsingar krevjast um støddd av lánum og innistandandi v.m., sbr. 1. stk. Eisini er heimild til eftir avgerð líkningarráðsins at krevja upplýsingar sbr. 1. stk. hjá ikki navngivnum persónum.

Í 2. stk. er heimilað líkningarmyndugleikunum eftir nærri fyriskipan Líkningarráðsins í samstarvi við bankar, sparikassar v.m. at koma á staðið hjá hesum og har ganga ígjøgnum roknskapartilfar, fylgiskjøl v.m., sum eru nevnd í § 119, 2. stk. Somuleiðis tryggja sær upplýsingar eftir 1. stk.

6) § 120 b: Við hesari grein verður álagt bankum, sparikassum, postgirostovum og øðrum, eina "sjálvvirkandi" upplýsingarskyldu mótvegis líkningarvaldinum, soleiðis, at latast skulu upplýsingar um upphædd av latnum ella góðskrivaðum rentum í árinum frammanundan. Samstundis skal upphædd av tí innistandandi á teim rentuberandi konti við árslok upplýsast.
Tá ið tað møguliga kann vera tørvur á at lata onnur, sum renta innistandandi ella líknandi, sum annar persónur eigur, t.d. "juridiskar persónar" koma undir upplýsingarskyldina, verður skotið upp, at landsstýrið fær heimild at ásetta nærri reglur um hetta. Upplýsingarnir frá teimum, sum hava skyldu at lata upplýsingar skulu umframt navn og bústað innihalda persóntal ella arbeiðsgevaratal kontoeigarans.

Landsstýrið kann gera avmarkingar í upplýsingarskipanini, bæði viðvíkjandi hvør skal hava upplýsingarskyldu, og støddd og slag av teimum uppnæddum, sum skulu fráboðast.

Viðvíkjandi konti, sum hoyra til persónar, sum hava bústað uttanlands, verður landsstýrinum heimilað at áseta nærri reglur.

7) § 120 c: Fyri at upplýsingarskipanin kann virka, er tað neyðugt at áseta, at upplýsast skulu persóntal ella arbeiðsgevaratal kontohavarans.

Haraftrat mugu aðrir upplýsingar latast, sum eru neyðugir fyri at vita, hvør ið kontohavarin er, men tá ið hesir upplýsingar kunnu vera ymiskir fyri einstakar bólkar av kontohavarum, verður mælt til, at nærri reglur um hetta kunnu ásetast av landsstýrinum.

Somuleiðis kann landsstýrið áseta reglur um, hvørji prógv skulu vísast í sambandi við stovnan av konti.

8) § 120 d: Fyri at lætta um mannagongdina við at fáa konti útgjørdar við upplýsingum um persóntal ella arbeiðsgevaratal kontohavarans, verður mælt til, at líkningarráðið skal kunna geva teimum, sum hava upplýsingarskyldu, neyðugar upplýsingar.

9) § 120 e: Grundað á eftiransingina við øll tey, sum koma undir upplýsingarskylduna viðvíkjandi rentum, eisini lúka teirra skyldur, kann verða neyðugt at stovna eina skrá yvir tey, sum hava hesa skyldu.

10) § 120 f: Orsakað av eftirlitinum við, at tær upplýsingar, sum verða latnar líkningarráðnum viðvíkjandi rentum og innistandandi eru rættar, má møguleiki vera fyri at føra eftirlit við roknskapum hjá teimum, sum hava upplýsingarskyldu viðvíkjandi rentutilskrivingini.

11) § 120 g: Tann uppskotna upplýsingarskipanin skal ikki fevna um konti, ið hoyra til limir hjá kongahúsinum, ið eru undantikin skattskyldu. Konti hjá útlendskum umboðum, sbr. § 3, 1. stk. litra d í skattalógini, verður tilmælt undantiknar eftir nærri reglum, sum landsstýrið ásetur.

12) § 120 h: Í 1. stk. verður ásett, hvørji hava skyldu at lata upplýsingar um rentuútreiðslur v.m. til líkningarvaldið. Landsstýrið kann tó áseta at onnur, sum læna pening út ella á annan hátt eru millummenn á líknandi hátt fyri útlán, eisini skulu koma undir upplýsingarskylduna. Her kann hugsast, at fíggjarfyritøkur og onnur, sum lata lán á sama hátt sum peningastovnar v.m. kunnu koma undir upplýsingarskylduna.
Avgerandi fyri upplýsingarskylduna er, at talan er um útlán, sum verða latin ella gjøgnum millummann verða latin ímóti renting og at hetta fer fram sum liður í útlænarans vinnu.
Kreditveiting og ognan av kreditorrættinum í sambandi við eitt útlán kemur eisini undir hesa grein.

Við at taka "millummenn" av útlánum við, verður tryggjað, at veðhaldslánsstovnar v.m., sum ikki beinleiðis læna út, koma undir upplýsingarskylduna.

Sambært 2. stk. skal fráboðanin innihalda upplýsingar til sannan av lántakara og upplýsingar um konto- og lániviðurskifti. Tann, ið sum skuldari hevur yvirtikið eitt

verandi lán verður eisini at meta sum lántakari.
Tann, sum hevur upplýsingarskyldu, skal fyri hvørt útlán upplýsa:

1) slag av láni,
2) stødd av tilskrivaðum ella falnum rentum. Tað hevur ongan týdning, um nakað er goldið,
3) stødd av provisión v.m.,
4) stødd av skuldini pr. 31. desember í árinum frammanundan og
5) upplýsingar sum landsstýrið krevur sbrt. 3. stk.

Tey, sum hava upplýsingarskyldu, skulu sbrt. 5. stk. boða lántakaranum frá, hvørjar upplýsingar verða latnir til líkningarmyndugleikarnar. Fráboðanin skal gerast í seinasta lagi 1. februar í árinum aftaná álmanakkaárið, sum upplýsingarnar viðvíkja. Hetta til tess at tryggja, at lántakarin, tá ið hann skal gera sjálvuppgávuna, hevur kunnleika til tær upplýsingar, sum líkningarmyndugleikarnir nýta í sambandi við skattaálíkningina.

Landsstýrið kann áseta, at fráboðanin skal fevna um aðrar upplýsingar um lánið.

13) § 120 j: Í 1. stk. eru nevnd onnur dømi um hvørji hava upplýsingarskyldu. Tann, sum hevur hesa skyldu skal fyri hvørt pantibræv fráboða

1) stødd av tilskrivaðum ella gjaldkomnum rentum í árinum frammanundan,
2) stødd av restskuld pr. 31. december og
3) áljóðandi virði av restskuld pr. 31. december. Sambært 4. stk. verður álagt teimum, sum hava upplýsingarskyldu at boða frá, hvørjar upplýsingar eru latnar skattavaldinum. Fráboðanarskyldan er galdandi bæði yvir fyri skuldaranum og goymsluhavaranum.

Landsstýrið kann áseta, at fráboðanin skal innihalda aðrar upplýsingar um pantibrøv, sum liggja á goymslu.

14) § 120 k: Til tess at teir, sum hava upplýsingarskyldu, kunnu lata upplýsingar eftir reglunum í § 120 h og § 120 j, mugu hesir hava kunnleika til upplýsingar til sannan av lántakara, (herundir skuldara sambært pantibræv á goymslu) umframt goymsluhavara. Tessvegna verður mælt til, at viðkomandi lántakarar og goymsluhavarar hava skyldu til at lata teimum, sum hava upplýsingarskyldu, upplýsingar til sannan av lántakara ella goymsluhavara. Tað snýr seg her serliga um persónttal.

15) § 120 l: Eftir hesi reglu kann verða álagt einum, sum hevur upplýsingarskyldu, dagliga sekt, um hann ber seg undan sínari skyldu.

16) § 120 m: Reglan skal tryggja, at tann, sum hevur upplýsingarskyldu, ikki kann lata persóntal til onnur.

17) § 120 n: Í hesari grein verður heimilað landsskattanevndini at krevja upplýsingar í sambandi við kæruviðgerð, har tað er heimilað líkningarmyndugleikunum at krevja upplýsingar í sambandi við skattaálíkningina.

Talan er annars bert um, at galdandi § 120 a verður broytt til § 120 n og sostatt ikki

um innihaldsligar broytingar.

Viðvíkjandi gildiskomureglunum annars. verður víst til § 2 í uppskotinum.

1. viðgerð 27. oktober 1993. Málið varð beint í skattanevndina. sum 23. november 1993 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 20. oktober 1993 og eftir 1. viðgerð 27. oktober 1993 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við Toll- og Skattastovu Føroya.

Undir viðgerðini er komið fram. at landsstýrið hevur mett tað neyðugt. at gildisreglurnar fyri P-talið verða umhugsaðar av nýggjum. tá nú er komið so langt út á árið. at óvist kann vera. um peningastovnarnir hava møguleikar at fáa skipanirnar klárar til 31.12.1993. Kortini verður hildið neyðugt. at fasthaldast skal. at upplýsingarskyldan verður galdandi fyri saldoupplýsingar pr. 31.12.1993. men at peningastovnarnir fáa freist til 1.03.1994 til at lata skattavaldinum saldoupplýsingarnar. og at hava allar kontoir skrásettar við P-tali henda dag.

Harumframt verður av umsitingarligum grundum neyðugt at fáa broytt 120 h soleiðis. at heimild verður fyri at fáa upplýsingar um latnar eila góðskrivaðar rentur. um tað gerst neyðugt, meira enn einaferð árliga. Her verður serliga tonkt upp á igongdverandi arbeiði við at bøta um ræuleikan í fyribilsskattaskránni.

Tá so langt er liðið út á árið og arbeiðið við at seta upp sjálvuppgávur og ognaruppgerðir fyri 1993 longu er langt ávegis, verður skotið upp, - fyri ikki síðst í december at skula gera broytingar til sjálvuppgávublankettirnar. og tí enn er óvist, hvussu frádráttsurin skal verða settur - at tann frádráttur, ið skotin er upp í § 33 nr. 12 fyri meirútreiðslur hjá skattgjaldarum. ið arbeiða í útlondum. fyrst kemur í gildi 1. januar 1994.

Tryggingarsambandið Føroyar er komið til skattanevndina við upplýsingum um tryggingarviðurskiftini hjá teimum skattgjaldarum. ið fara til útlandið at arbeiða. Teir vísa á. at hesin bólkur av skattgjaldarum fær meirútreiðslur við at hava arbeiði í útlandinum. tá teir vegna. at føroysku sjúkrakassarnir ikki fevna um arbeiðsskaðar í útlandinum. eru noyddir til at tekna eyka sjúkratrygging og møguliga eisini aðra vanlukkutrygging. víst verður til skriv frá Tryggingarsambandinum Føroyar. dagfest 03.09.1993. Ið er at meta út frá hesum skrivi. hvussu stór meirútreiðslan hjá tí einstaka verður. men um frádráttur skal játtast fyri slíkar eykatryggingar vegna arbeiði uttanlands. so kunnu - fyri ikki at fáa ov nógva umsiting burtur úr hesum - hesar útreiðslur verða fastsettar sum ein standardfrádráttur. ið verður ásettur av Líkningarráði Føroya.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og 2 minnilutar.

Meirilutin (Lasse Klein, Heini O. Heinesen og Eyðálvur Dimon) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins við hesum broytingum og setir tí fram soljóðandi

broytingaruppskot

1) Í pkt. 3) í § 33 nr. 12 pkt. 1 verður eftir "flutningsútreiðslur" sum ískoyti sett "sjúkra- og vanlukkutryggingar".

Sum nýtt pkt. 4 í § 33 nr. 12 verður sett "Frádráttur fyri sjúkra- og vanlukkutrygging verður árliga ásettur, sum galdandi fyri komandi álmanakkaár av Líkningarráð Føroya, sum eisini kann áseta neyvari reglur fyri, hvussu frádráttarin verður veittur".

Pkt. 4 verður hereftir pkt. 5.

1) I pkt. 3) i § 33 nr. 12 pkt. 1 tilføjes efter "befordringsudgifter" "syge- og ulykkesforsikring".
Som nyt pkt. 4 i § 33 nr. 12 indsættes "Fradraget for syge- og ulykkesforsikring fastsættes en gang om året, som gældende for det efterfølgende kalenderår, af Færøernes Ligningsråd, som også kan fastsætte nærmere bestemmelser om, hvorledes fradraget ydes".

Pkt. 4 bliver herefter pkt. 5.

2) Í pkt. 12) verður § 120 h skt. 1 orðað soleiðis:
"Bankar, sparikassar, postgirostovan, Føroya Ídnaðargrunnur, Færøernes Realkreditinstitut, Jarðargrunnurin, Menningargrunnur Ídnaðarins, P/F Húsalán, tryggingarstovur og onnur, sum sjálvi lána út pening í móti renting, skulu í samband við fyribilsálíkningina og skattaálíkningina 2 ferðir á hvørjum ári, uttan at biðið verður um tað, lata tær í stk. 2 nevndu upplýsingar til líkningarmyndugleikarnar. Landsstýrið kann áseta, at gjaldskortútskrivarar og onnur, sum læna pening út á samsvarandi hátt, hava upplýsingarskyldu.

Í stk. 2 í § 120 h verður eftir nr. 5) sett "6) mettar rentur í inntøkuárinum".

2) I pkt. 12) affattes § 120 h stk. 1 således:
"Banker, sparekasser, postgirokontoret, Føroya Ídnaðargrunnur, Færøernes Realkreditinstitut, Jarðargrunnurin, Menningargrunnur Ídnaðarins, P/F Húsalán, forsikringsselskaber og andre, der som led i deres virksomhed yder eller formidler udlån mod forrentning, skal til brug ved forskudsligningen og skatteligningen 2 gange hvert år uden opfordring indberette de i stk. 2 nævnte oplysninger til ligningsmyndighederne. Landsstyret kan bestemme, at betalingskortudstedere og andre, der yder eller formidler udlån på tilsvarende måde, er omfattet af oplysningspligten".

I stk. 2 i § 120 h indsættes efter nr. 5) "6) skønnede renter i kalenderåret".

3) Í § 2 stk. 2 verður aftan á orðingina

"broyting nr. 1" sett ",3".

4) Í § 2 stk. 5 og stk. 13 pkt. 2 verður "31. desember 1993" broytt til 1. mars 1994".

5) § 2 stk. 10 pkt. 2 verður orðað soleiðis:
"skuld og áljóðandi virði av hesum skal verða upplýst fyrstu ferð fyri saldo pr. 31. desember 1993".

6) Í § 2 stk. 14 pkt. 2 verður "20. januar 1994" broytt til 1. mars 1994".

3) I § 2 stk. 2 indsættes efter "ændring nr. 1" ",3".

4) I § 3 stk. 5 og stk. 13 pkt. 2 ændres "31. december 1993" til "1. marts 1994".

5) § 2 skt. 10 pkt. 2 affattes således:
"Gæld og pålydende værdi heraf skal oplyses første gang for saldo pr. 31. december 1993".

6) I § 2 stk. 14 pkt. 2 ændres "20. januar 1994" til "1. marts 1994".

Minnilutin (Jógvan Sundstein) vísir til álit sítt í løgtingsmáli nr. 19/1993.

Minnilutin (Finnbogi Arge) hevur hesar viðmerkingar:

Lógaruppskotið broytir skattahámarkið soleiðis, at hámarkið verður hækkað úr 50% til 57%. Eykaskatturin, sum hevur verið galdandi seinastu 2 árini, og sum av landsstýrinum varð sagdur at vera ein fyribilsskattur, sum skuldi takast av aftur, verður nú lagdur inn í skattastigan og fær sostatt ein permanentan karakter.

Men 57% markið er als ikki ovasta mark, tí onnur gjøld koma omaná, sum t.d. arbeiðsloysistryggingargjald og arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin. Fólk rinda eisini til fakfeløg, so trýstið kemur nú lættliga upp um 60%, men vit skulu ikki gloyma, at samstundis verður eisini talan um eina sera stóra hækking í kommunuskattinum, og allar hækkingarnar koma í senn.

Javnaðarflokkurin gjørdi í byrjanini av valskeiðnum nógv burtur úr at frentja marginalskattalækking soleiðis, at seinast vunna krónan ikki varð ov hart skattað. Men nú kemur hægsti marginalskattur upp á 77% aftan á allar broytingarnar, so her ber ikki til at siga, at væl er komið burturúr.

Samstundis sum skattastigin hækkar við rekordferð, er óbeinleiðis skatturin hækkaður orsakað av mvg gjaldinum. Hin vegin eru ymiskir frádráttarmøgulcikar burturdotnir í hesum valskeiði. Samstundis er lønarlagið lækkað við tí úrsliti, at ógvusliga reallønarlækkingin hjá okkum neyvan eigur sín líka í øðrum framkomnum londum.

Fyri vanliga løn er talan um eina reallønarminking upp á 18%, men minkingin er nógv størri fyri hægru lønirnar. Avleiðingarnir av hesum eru eyðsýndar, fólk eru í túsundatali ílýggjað av landinum, og við fólkinum fer eisini kapitalurin. Uttan kapital kann eitt samfelag ikki rekast. Svart arbeiði er vorðið tað vanliga heldur enn undantakið. Alt ov høga skattatrýstið tvingar fólk til at brúka óskrásetta arbeiðsmegi.

Handils- og tænastuvinnan er burturdottin orsakað av høga skattatrýstinum, og saman við hesari vinnu er hópin av arbeiðsplássum farin fyri skeyti. Í framkomnum londum er tað júst tertiera vinnugreinin, sum skapar flestu arbeiðsplássini, meðan automatiseringin hevur havt við sær, at alt færri arbeiðspláss verða tøk í primeru og sekunderu vinnuni. Tí er tað sera umráðandi at gjøgnumføra skattalækkingar fyri at fáa tertierar vinnugreinir at virka aftur, men hetta letur seg ikki gera uttan so, at keypiorkan hækkar aftur.

Keypiorkan lækkar við lógaruppskotunu landsstýrisins, og úrslitið verður, at enn fleiri arbeiðspláss í handils- og privatu tænastuvinnuni detta burtur. Minnilutin (Finnbogi Arge) tekur ikki undir við skattahækkingini og mælir tinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin tekur heldur ikki undir við sjálvvirkandi flyting av upplýsingum úr peningastovnum o.ø. til líkningarvaldið. Trygdarprocedura átti at verðið innført soleiðis, at ikki ein og hvør kann gera sær dælt av viðurskiftunum hjá medborgarunum. Í okkara lítla samfelag kann slíkt skjótt verða misnýtt. Havast skal í huga, at sami teldukjarni rekur bæði bankaskipanina og skattaskipanina, so samkoyringarmøguleikin er sera góður. Í minsta lagi eigur ein trygdarskipan at verða innført soleiðis, at tað altíð kann staðfestast, hvør tað er, sum hevur kannað viðurskiftini hjá tí einstaka.

Við hesum viðmerkingum verður sett fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Í sambandi við innføring av sjálvvirkandi flyting av upplýsingum úr peningastovnum til líkningarvaldið verður álagt landsstýrinum at seta trygdarskipan (sikkerhedsprocedure) í verk, áðrenn sjálvvirkandi skipanin fer í gongd soleiðis, at tað bert eru tey, sum hava fingið til uppgávu at kanna skattaviðurskiftini hjá borgarunum, sum hava atgongd til upplýsingarnar. Teldutrygdarskipanin skal skipast soleiðis, at tað altíð ber til at staðfesta, hvør tað er, sum hevur kannað viðurskiftini hjá tí einstaka.

2. viðgerð 25. november 1993. Broytingaruppskotið frá meirilutanum samtykt við 17-1 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins soleiðis broytt samtykt við 17-0 atkvøðum. Uppskot til samtyktar frá minnilutanum samtykt við 27-0 atkvøðum.

3. viðgerð 2. desember 1993. Uppskotið endaliga samtykt við 17-8.

Lóg nr. 194 frá 10. desember 1993.

27 Løgtingslóg um ásetan av kommunuskattaprosenti og um kommunalan kreppuláns og veðhaldsgrunn

Ár 1993, 21. oktober legði Signar á Brúnni, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um ásetan av kommunuskattaprosenti og um kommunalan kreppuláns- og veðhaldsgrunn v. m.

§ 1. Fyri inntøkuárini 1994 og 1995 ásetir landsstýrið líkningarprosentið fyri kommunu- og kirkjuskatt og ásetir samstundis barnafrádráttin í útroknaða kommunuskattinum.
Stk. 2. Kommunu- og kirkjuskattaprosentið verður ásett í seinasta lagi 1. desember sum galdandi fyri álmanakkaárið eftir.

§ 2. Kommunurnar skulu innan 1. november hava samtykt eina fíggjarætlan fyri komandi fíggjarár. Tann í pkt. 1 nevnda freist er tó fyri fíggjarárið 1993 15. november.
Stk. 2. Fíggjarætlanin verður gjørd eftir reglum og kontoplani, sum landsstýrið ásetir.
Stk. 3. Kommunurnar verða at rinda raksturin, heruppií rentur og avdráttir, við skatti og øðrum inntøkum. Í 1994 og 1995 kunnu rakstrarútreiðslurnar hjá kommununum pr. íbúgva - tá rentur og avdráttir ikki eru íroknað - ikki fara upp um rakstrarútreiðslurnar í 1993.
Stk. 4. Landsstýrinum verður í serligum førum heimilað at gera frávik frá reglunum í stk. 3.

§ 3. Fíggjarætlanin verður, beinanvegin hon er samtykt av bý- ella bygdaráðnum, at senda landsstýrinum, við tilskilan um hvussu nógv verður at krevja inn í kommunuskatti. Samstundis boðar kommunan landsstýrinum frá hvussu nógv skal krev-

lagtingslov om fastsættelse af kommuneskatteprocentet og om kommunal kriselåns- og garantifond m.v.

§ 1. For indkomstårene 1994 og 1995 fastsætter landsstyret ligningsprocentet for kommune- og kirkeskat, og fastsætter samtidig børnefradraget i den udregnede kommuneskat.
Stk. 2. Kommune- og kirkeskatteprocenten fastsættes senest 1. december gældende for kalenderåret efter.

§ 2. Kommunerne skal inden 1. november have vedtaget et budget for kommende finansår. Den i pkt. 1 nævnte frist er dog for finansåret 1993 15. november.
Stk. 2. Budgettet udarbejdes efter regler og kontoplan, som landsstyret fastsætter.
Stk. 3. Kommunernes drift, herunder renter og afdrag, skal finansieres med skat og andre indtægter. I 1994 og 1995 kan kommunernes driftsudgifter pr. indbygger - når renter og afdrag ikke er medregnet - ikke overstige driftsudgifterne i 1993.
Stk. 4. Landsstyret bemyndiges i særlige tilfælde til at dispensere fra reglerne i stk. 3.

§ 3. Budgettet skal, straks efter at det er vedtaget af by- eller bygderådet, sendes til landsstyret med angivelse om hvor meget der skal kræves ind i kommuneskat. Samtidig meddeler kommunen landsstyret, hvor meget der skal kræves ind i kirkeskat.

jast inn í kirkjuskatti, eftir tí av kirkjuráðnum innsendu fíggjarætlan.

§ 4. Landsstýrið góðkennir fíggjarætlanina, og kann gera neyðugar broytingar í tí av bý- ella bygdaráðunum samtyktu fíggjarætlan.
Stk. 2. Tann av bý- ella bygdaráðunum samtykta, og av landsstýrinum góðkenda fíggjarætlan, við møguligum broytingum eftir stk. 1, er bindandi fyri kommunalu umsitingina komandi fíggjarár.

§ 5. Við fíggjarætlanunum hjá kommununum fyri komandi ár, sum grundarlag, ásetir landsstýrið fyri hvørja kommunu, kommunuskattaprosentið fyri komandi inntøkuár, eftir at hava fingið ummæli frá Toll- og Skattstovu Føroya.
Stk. 2. Um skattaprosentið eftir fíggjarætlanini kann ásetast lægri enn 16%, verður skattaprosentið at hækka til minst 16%. Kann skattaprosentið eftir fíggjarætlanini ásetast til 16% ella hægri, kann landsstýrið hækka skattaprosentið. Tó kann kommunu- og kirkjuskattaprosentið ikki ásetast hægri enn 22 % tilsamans.

§ 6. Áðrenn kommunu- og kirkjuskatturin verður útgoldin ella avroknaður hvørjari kommunu eftir § 83 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, skal Føroya Gjaldstova afturhalda í kommunuskattinum eftir reglunum í stk. 2.
Stk. 2. Fyri kommunur, har skattaprosentið, eftir § 5, stk. 2 er sett hægri enn javnvágin á fíggjarætlanini treytar, verður ein upphædd afturhildin í kommunuskattinum, svarandi til munin millum skattaprosentið, sum kundi verið ásett sambært fíggjarætlanina, og tað av landsstýrinum ásetta.
Stk. 3. Upphæddin, sum verður afturhildin eftir stk. 2, fer í tann í § 6 nevnda kreppuláns - og veðhaldsgrunn.

efter det af kirkerådet indsendte budget.

§ 4. Landsstyret godkender budgettet, og kan foretage nødvendige ændringer i det af by- eller bygderådet vedtagne budget.
Stk. 2. Det af by- eller bygderådet vedtagne, og af landsstyret godkendte budget, med eventuelle ændringer efter stk. 1, er bindende for den kommunale administration kommende finansår.

§ 5. Med kommunernes budget for kommende år som grundlag fastsætter landsstyret for hver kommune kommuneskatteprocenten for kommende indtægtsår, efter at udtalelse er indhentet fra Toll- og Skattstova Føroya.
Stk. 2. Hvis skatteprocenten efter budgettet kan sættes lavere end 16%, forhøjes skatteprocenten til 16%, dog kan landsstyret forhøje det med mindst et procent. Hvis skatteprocenten efter budgettet kan sættes til 16% eller højere, kan landsstyret forhøje skatteprocenten. Dog kan kommune- og kirkeskatteprocenten ikke sættes højere end ialt 22%.

§ 6. Inden kommune- og kirkeskatten udbetales eller afregnes hver kommune efter § 83 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat, skal Føroya Gjaldstova tilbageholde i kommuneskatten efter reglerne i stk. 2.
Stk. 2. For kommuner, hvor skatteprocenten efter § 5, stk. 2 er sat højere end budgettets balance betinger, tilbageholdes et beløb i kommuneskatten, der svarer til forskellen mellem skatteprocenten, der kunne være fastsat i henhold til budgettet, og den af landsstyret fastsatte procent.
Stk. 3. Beløbet, som tilbageholdes efter stk. 2, går i den i § 6 nævnte krise- låns- og garantifond.

Kommunalur kreppuláns- veðhaldsgrunnur.

§ 7. Grunnurin umsitur tann pening, sum eftir § 6. stk. 3 verður latin grunninum. Peningurin, sum er latin grunninum, er ogn hjá teimum kommununum, sum hava latið í grunnin.

Stk. 2. Grunnurin kann veita lagalig lán til kommmunur ella veita veðhald fyri lánum í sambandi við at lán verða umløgd til lán við lægri rentu og/ella longri avdráttartíð.

Stk. 3. Landsstýrið ásetir við kunngerð nærri reglur um fyrisitingina av, og virksemi hjá grunninum.

Gildiskoma

§ 8. Henda lóg fær gildi dagin eftir hon er kunngjørd.

Stk. 2. Lógin hevur, við undantak av § 6. bert gildi til 1. januar 1996.

Stk. 3. Reglurnar í § 46, stk. 7, § 47, stk. 1, pkt. 3 og § 59 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, og reglurnar í § 29 og § 31, stk. 1 í løgtingslóg nr. 45 frá 29. juni 1972 um føroysku kommununar, verða settar ikki í nýtslu til fíggjarárini 1994 og 1995.

Kommunal kriselåns- og garantifond.

§ 7. Fonden administrerer de midler, der efter § 6, stk. 3 overlades fonden. Kommunerne bevarer ejendomsretten til de midler, der er overladt til fonden.

Stk. 2. Fonden kan yde lån på gunstige vilkår til kommuner, eller yde garanti for lån i forbindelse med at lån refinancieres til lån med lavere rente og/eller kortere afdragstid.

Stk. 3. Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse nærmere regler om fondens administration og virksomhed.

Ikrafttrædelse

§ 8. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Stk. 2. Loven har, med undtagelse af § 6, kun gyldighed til 1. januar 1996.

Stk. 3. Reglerne i § 46, stk. 7, § 47, stk. 1, pkt. 3 og § 59 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat og reglerne i § 29 og § 31, stk. 1 i lagtingslov nr. 45 af 29. juni 1972 om de færøske kommuner anvendes ikke for finansårene 1994 og 1995.

Viðmerkingar:

Hetta lógaruppskotið verður lagt fram fyri at betra um tað sera vánaliga gjaldførið hjá flestu kommununum. Støðan er so mikið vánalig, at fleiri av kommnunum ikki megna at svara gjaldsskyldum sínum, og er tí vandi fyri, at partar av virkseminum hjá kommununum steðgar upp. Fíggjartrupulleikarnir hjá kommununum vórðu umrøddir á fundunum, sum landsstýrið hevði við donsku stjórnina 28. mai og 12. oktober í ár. Á fundinum 12. oktober fekk landsstýrið greitt at vita, at tað er ikki møguligt at veita ríkiskassaveðhald fyri teimum kommunalu lánunum. Men í protokollatinum til avtaluna verður nevnt, at landsstýrið tekur stig til at styrkja fíggjarstøðuna hjá kommununum, tó uttan at hetta skal lyngja um hjá landskassanum.

Eftir teimum útrokningum, sum umsitingin í landsstýrinum hevur gjørt, bendir nógv á, at rakstrarhallið hjá kommununum í ár, aftaná rentur og avdráttir, verður uml. 60 mió. kr. og hava kommunurnar sostatt ein tilsvarandi fíggingartørv. Hetta hall er ikki møguligt hjá kommununum at fíggja við nýggjari lántøku. Nakrar kommunur hava hvør í sínum lagi roynt at loysa gjaldføristrupulleikarnar við m. a at hækka kommunu- skattaprosentið í 1993. Hetta hevur kortini víst seg ikki at vera nóg mikið at loysa trupulleikarnar, m. a. av teirri grund,

at skattaprosentið í teimum kommununum, sum hava hækkað tað, verður rættuliga høgt, samstundis sum munurin millum skattaprosentini í teimum ymisku kommununum verður so mikið stórur, at fólk flyta úr kommunum við høgum skattaprosenti til kommunur við lægri skattaprosenti. Kommunurnar fáa tí ikki tær við hækkingini av skattaprosentinum ætlaðu meirinntøkurnar.

Sum ein partur av loysnini á fíggjarligu trupulleikunum hjá kommununum verður tí skotið upp:

1. Landsstýrið fær heimild til, fyri fíggjar- og inntøkuárini 1994 og 1995, at ásetа kommunu- og kirkjuskattaprosentið, og at áseta barnafrádráttin í útroknaða kommunuskattinum.
2. Kommunu-og kirkjuskattaprosentið verður ásett til minst 16 % og í mesta lagi 22 %.
3. Í 1994 og 1995 skal nýtslan hjá kommununum pr. íbúgva - tá rentur og avdráttir ikki eru íroknað - ikki fara uppum nýtsluna í 1993.
4. Avlop í kommunuskattinum, sum soleiðis kemur fram, fer í ein kreppulánsgrunn, sum veitir lán til tær kommunur, ið ikki eru førar fyri at røkja gjaldsskyldur sínar. Kommunurnar varðveita ognarrættin til sín part av inngjaldinum.

Landsstýrið ætlar við hesum uppskotinum:
at tryggja, at kommunuskattaprosentið verður sett soleiðis, at kommunurnar, í størst møguligan mun, við skattainntøkum og øðrum egnum inntøkum, fáa javnvág í raksturin.
at minka um munin á skattaprosentunum í kommununum, so at kommunurnar í størri mun fáa meirinntøkurnar av eini skattahækking,
at tær kommunurnar, sum eru serliga illa fyri fíggjarliga, fáa eina ávísa hjálp frá teimum kommununum, sum eru frægari fyri, soleiðis at neyðugir partar av virkseminum hjá hesum kommununum ikki steðga upp.

Landsstýrið roknar við, at við teimum neyðugu hækkingunum av kommunuskattaprosentunum eftir hesum lógaruppskotinum verður fíggingartørvurin hjá teimum kommununum, sum hóast eitt kommunuskattaprosent uppá 22 %, ikki fáa javnvág í raksturin, leysliga mett uml. 40 - 50 mió. kr. Her er talan bert um langfreistaða skuld. Roknað verður við, at avlop í kommunuskattinum, sum kann fara í tann í uppskotinum nevnda kreppu- og veðhaldgrunn, verður uml. 14 - 18 mió. kr.

Sum nevnt, verða fíggjartrupulleikarnir hjá kommununum ikki loystir við teimum tiltøkunum einans, sum her verða skotin upp.

Men landsstýrið leggur hetta uppskotið fyri løgtingið við tí fyritreyt, at ein avtala fæst við lángevarar hjá kommununum um at lækka rentuna og/ella leingja avdráttartíðina. Hetta hevði, sum útrokningar hjá umsitingini í landsstýrinum vísa, hjálpt munandi um gjaldførið hjá kommununum.

Viðvíkjandi reglunum í uppskotinum er at siga, at hesar hava við sær, í eitt avmarka tíðarskeið - í 1993, tá kommunu- og kirkjuskattaprosentið og barnafrádráttur skal ásetast fyri inntøkuárið 1994, og í 1994, tá nevnda líkningarprosent og barnafrádráttir skulu ásetast inntøkuárið 1995 - verða tað ikki býa- og bygdaráðini, sum áseta skattaprosentið, men landsstýrið, smbr. § 1 í uppskotinum. Hetta verður mett at vera neyðugt, um sleppast skal

undan stóra muninum á kommunuskattaprosentunum í kommununum, og um nakað avlop skal fáast til kreppu- og veðhaldsgrunnin.

Loft verður lagt yvir rakstrarútreiðlurnar, sum landsstýrið tó kann loyva at vikið verður frá í serligum førum, smbr. § 2.

Landsstýrið skal góðkenna fíggjarætlanina. Hetta merkir, at eykajáttanir í fíggjarárinum eisini krevja landsstýrisins góðkenning. Um landsstýrið metir, at útreiðslur, sum áttu at verið tiknar við í fíggjarætlanini, sum býar- ella bygdaráðið hevur góðkent, ella at útreiðslur eru tiknar við sum ikki áttu at verið tað, kann landsstýrið gera broytingar í fíggjarætlanini. § 4.

Skattaprosentið, sum verður ásett eftir § 5 í uppskotinum, verður ásett soleiðis, at um skattaprosentið kann vera lægri enn 16 %, t. d. 13 ella 14, fyri at fáa javnvág á fíggjarætlanina, verður tað hækkað til minst 16 %. Kann skattaprosentið á tílsvarandi hátt setast til 16 % ella hægri, kann tað hækkast, men ikki setast hægri enn 22 %.

Kommununar verða avroknaðar við eini upphædd svarandi til tað skattaprosentið, sum hevði givið javnvág á fíggjarætlanina.

Munurin millum hesa upphæddina, sum kommununar verða avroknaðar við, og tað sum er innkomið í kommunuskatti, fer í kreppu- og veðhaldsgrunnin.

Ætlanin er, at kommunur, sum sjálvt við einum skattaprosentið uppá 22 %, og aftaná møguligar rentulækkingar og/ella longda avdráttartíð, ikki fáa raksturin at bera seg, kunnu fáa lán úr grunninum til neyðugan rakstur, og at veðhald kann veitast í sambandi við umfígging ella rentulækking.

Leggjast kann aftrat, at landsstýrið arbeiðir við at gera nýggjar reglur um viðurskiftini millum kommununar og vinnulívið og broytingar í kommunulógini, serligar viðvíkjandi fíggjarviðurskiftunum hjá kommununum. Onkrar av teimum reglum, sum her eru skotnar upp, t.d. reglurnar í § 2, stk. 2, eiga í tí sambandinum at verða flættar yvir í kommunulógina.

1. viðgerð 29. oktober 1993. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 16. november 1993 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 21. oktober 1993 og eftir 1. viðgerð 29. oktober 1993 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini hildið fund við kommunubólkin, sum fevnir um umboð frá teimum fýra størstu kommununum og frá Føroya Kommunufelag. Nevndin hevur somuleiðis hildið fund við stjórarnar í teimum báðum stóru bankunum og stjóran fyri Tryggingarsambandið Føroyar. Eisini hevur fíggjarnevndin hildið fund við landsstýrismannin í kommunumálum og embætismenn í landsumsitingini.

Umboðini fyri kommunurnar høvdu ymiskar viðmerkingar til lógaruppskotið frá landsstýrinum og søgdu m.a., at sjálvræðið verður tikið frá kommununum, og at allar kommunurnar í landinum eru ímóti uppskotinum. Kommunubólkurin greiddi frá teirra egna uppskoti, sum hevur til endamáls at skipa ein grunn, har lánveitarar eina ferð skjóta eina upphædd inn, sum svarar til ávísan prosentpart av útlandinum til føroyskar kommunur, og at kommunurnar nøkur ár fram skjóta ávísan prosentpart av síni lánsskuld í grunnin.

Umboðini fyri kommunubólkin kundu undir ongum umstøðum taka undir við, at landsstýrið skal áseta tey kommunalu skattaprosentini, men hildu hin vegin, at landsstýrið eigur at tryggja sær, at kommunurnar ikki seta ov lág ella ov høg skattaprosent. Umboðini fyri kommunurnar greiddu annars frá, at tey uttan úrslit høvdu roynt at fáa ein fund í lag millum landsstýrið, lánveitararnar og kommunubólkin.

Fíggjarnevndin er av teirri áskoðan, at til tess at tryggja kommununum neyðuga ávirkan í kommunala kreppulánsgrunninum sambært § 9 í fyriliggjandi lógaruppskoti skal landsstýrið áseta greiniligari reglur eftir tilmæli frá kommununum soleiðis, at kommunurnar fáa tutalsliga neyðuga ábyrgd og ávirkan.

Fíggjarnevndin heldur, at grunnurin eigur at vera stjórnaður av eini nevnd, har kommunurnar hava eina rimiliga umboðan.

Umboð fyri lánveitararnar løgdu stóran dent á, at sløðan hjá føroysku kommununum sum skuldarar framyvir verður styrkt. Teir vístu á, at hetta kann verða gjørt við samhaldsfastari ábyrgd, t.d. við at skipa felagsgrunn ella grunnar. Teir mettu, at um hetta varð gjørt, verður møguleiki fyri at fáa skuldarsanering í lag, bæði við føroyskar og útlendskar lánveitarar. Upp á spurningar um, hvat ein slík skuldarsanering møguliga kemur at fevna um, varð sagt, at talan kemur at vera um at lækka rentu, leingja avdráttartíð og møguliga at gera beinleiðis avskrivingar í høvuðsskuldini.

Fundamálið við lógini er at fara í samráðingar við lánveitarar um rentuupphæddina, leinging av avdráttartíðini og møguliga skerjing av restlánunum. Fíggjarnevndin ætlar, at lógin skal verða grundarlag undir hesum samráðingum, og at bankarnir søgdu seg vera fúsar at taka upp tingingar við danskar og útlendskar lánveitarar viðvíkjandi einari skuldarsanering fyri føroysku kommunurnar.

Signar á Brúnni, landsstýrismaður, greiddi frá, at landsstýrið hevur viðgjørt støðuna hjá føroysku kommununum av nýggjum, og mælir fíggjarnevndin til at seta fram nýtt lógaruppskot í staðin fyri uppskot landsstýrisins í løgtingsmáli nr. 27/93.

Høvuðsbroytingin, sum landsstýrismaðurin mælti til, er, at landsstýrið ikki skal áseta kommunuskattaprosentini, men at kommunurnar sjálvar skulu áseta hesi, tó soleiðis, at einki kommunuskattaprosent kann vera lægri enn 16% og hægri enn 22%. Av hesum skal eitt prosent fara í ein kommunalan kreppulánsgrunn. Árliga gevur hetta umleið 35-38 mió. kr.

Víðari greiddi landsstýrismaðurin frá, at um ásetta skattaprosentið í eini kommunu gav meiri pening enn tørvur er á fyri at reka kommununa, skal hesin fara í ein kommunalan ognargrunn hjá avvarðandi kommunu og bert nýtast við loyvi frá landsstýrinum.

Aftan á fund við landsstýrismannin í kommunumálum hevur fíggjarnevndin aftur hildið fund við kommunubólkin, har hesin varð kunnaður um fýggja tilmælið frá landsstýrismanninum í kommunnmálum, og avtalað varð, at kommunubólkurin skuldi lata fíggjarnevndini skrivligar viðmerkingar til tilmælið frá landsstýrinum. Hesar viðmerkingar hevur nevndin fingið og viðgjørt.

Undir viðgerðini hevur nevndin lagt stóran dent á at samskipa sjónarmiðini hjá landsstýrinum, lánveitarunum og kommunubólkinum. Í samráð við partarnar er nevndin vorðin samd um at seta eitt nýtt lógaruppskot í staðin fyri uppskot landsstýrisins.

Vísandi til frammanfyristandandi setir **ein samd nevnd** fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um tær kommunalu fíggjarætlanirnar, áseting av kommunuskattaprosentinum, kommunalan kreppulánsgrunn v.m.

§ 1. Fíggjarnevndin hjá bygda(r)ráðnum ella, har eingin fíggjarnevnd er, bygda(r)ráðið, skal fyri 1. oktober hava gjørt uppskot til ársfíggjarætlan fyri komandi fíggjarár. Avrit av uppskotinum verður sent landsstýrinum.

Stk. 2. Ársfíggjarætlanin skal tvær ferðir verða viðgjørd í bygda(r)ráðnum við í minsta lagi 14 døgum ímillum. Ársfíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. december. Beinanvegin ársfíggjarætlanin er endaliga samtykt av bygda(r)ráðnum, verður hon send landsstýrinum til góðkenningar.

Stk. 3. Tann av bygda(r)ráðnum samtykta, og av landsstýrinum eftir § 4 í hesi lóg, góðkenda, ársfíggjarætlanin er bindandi fyri, hvussu nógv kann útskrivast í kommunuskatti komandi fíggjarár.

Stk. 4. Ikki kann útskrivast meira og ikki minni í kommunuskatti enn svarandi til ávikavist 23% og 16%.

Stk. 5. Samstundis sum ársfíggjarætlanin verður endaliga samtykt, verða kommunn- og kirkjuskattaprosentið og barnafrádráttarin í útroknaða kommunuskattinum ásett

lagtingslov om de kommunale budgetter, fastsættelse af kommuneskatteprocenten, kommunal krisefond m.v.

§ 1. Bygderådets finansudvalg eller, hvor der intet finansudvalg er, bygderådet, skal inden 1. oktober have udarbejdet forslag til årsbudget for det kommende finansår. Genpart af forslaget skal tilsendes landsstyret.

Stk. 2. Årsbudgettet skal behandles i bygderådet to gange med mindst 14 dages mellemrum. Årsbudgettet skal være endelig vedtaget senest 1. december. Så snart årsbudgettet er endeligt vedtaget af bygderådet, skal det sendes landsstyret til godkendelse.

Stk. 3. Det af bygderådet vedtagne, og af landsstyret i henhold til § 7 i denne lov, godkendte årsbudget er bindende for, hvor meget der kan udskrives i kommuneskat for det kommende finansår.

Stk. 4. Der kan ikke udskrives mere eller mindre i kommuneskat, end der svarer til henholdsvis 23 og 16%.

Stk. 5. Samtidig med årsbudgettet endelig vedtaget fastsættes kommune- og kirkeskatteprocenten og børnefradraget i den gældende udregnede kommuneskat, som gældende for det følgende indtægtsår.

sum galdandi fyri inntøkuárið eftir.

§ 2. Landsstýrið kann fyri fíggjarætlanina fyri 1994 loyva, at vikið verður frá reglunum í § 1, stk. 1 og stk. 2.

§ 3. Fíggjarætlanin og kontoskipanin verða gjørdar eftir reglum, sum landsstýrið ásetir.

§ 4. Tann av bygda(r)ráðnum samtykta og av landsstýrinum góðkenda ársfíggjarætlanin er bindandi fyri kommunalu umsitingina komandi fíggjarár.
Stk. 2. Bygda(r)ráðið kann um neyðugt geva eykajáttanir. Tílíkar eykajáttanir krevja tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 døgum ímillum og skulu góðkennast av landsstýrinum. Landsstýrið skal í seinasta lagi 14 dagar eftir, at umsókn um eykajáttan er móttikin, hava givið kommununum boð um avgerð landsstýrisins.
Stk. 3. Ikki má verða farið undir eitt arbeiði, sum ikki er avsett til á fíggjarætlanini, uttan at neyðug eykajáttan verður samtykt av bygdarráðnum og góðkend av landsstýrinum. Tó kann verða farið undir lógásett tiltøk, áðrenn játtanin og góðkenningin frá landsstýrinum fyriliggur, men játtan frá bygda(r)ráðnum og góðkenning frá landsstýrinum má tá sum skjótast útvegast.

§ 5. Kommununum er ikki loyvt at fíggja raksturin, heruppií rentur og avdráttir og avsetingar eftir § 9 í hesi lóg við lántøku. Bygda(r)ráðini verða at útskriva so mikið í kommunuskatti, at javnvág verður á ársfíggjarætlanini, smbr. tó § 1, stk. 4.

§ 6. Avlop av rakstrinum í einum fíggjarári, ið stendst av hækkaðum skattaprosenti eftir hesi lóg, skal setast í ognargrunnin hjá kommununi, og nýtslu úr grunninum kann bert fara fram við loyvi landsstýrisins og sambært reglugerð, ið er góðkend av landsstýrinum.

§ 2. Landsstyret kan angående budgettet for 1994 tillade, at der dispenseres fra reglerne i § 1, stk. 1 og stk. 2.

§ 3. Budgettet og kontoplanen udfærdiges efter regler, som landsstyret fastsætter.

§ 4. Det af bygderådet vedtagne og af landsstyret vedtagne budget er bindende for den kommunale administration det kommende finansår.
Stk. 2. Bygderådet kan om fornødent give ekstrabevillinger. Sådanne ekstrabevillinger fordrer to behandlinger med mindst 14 dages mellemrum og skal godkendes af landsstyret. Landsstyret skal senest 14 dage efter, at ansøgning om ekstrabevilling er modtaget, have meddelt kommunerne landsstyrets beslutning.
Stk. 3. Intet arbejde må påbegyndes, der ikke er vedtaget i budgettet, uden at nødvendig ekstrabevilling vedtages af bygderådet og godkendes af landsstyret. Dog kan lovbestemte initiativer påbegyndes forinden bevillingen og godkendelsen fra landsstyret foreligger, men bevilling fra bygderådet og godkendelse fra landsstyret må dog som snarest tilvejebringes.

§ 5. Kommunerne har ikke tilladelse til at finansiere driften, herunder renter og afdrag og hensættelser i henhold til § 9 i denne lov med låneoptagelser. Bygderådene skal udskrive så meget i kommuneskat, at årsbudgettet balancerer, jvf. dog § 1, stk. 4.

§ 6. Overskud af driften i et finansår, der er forårsaget af forhøjet skatteprocent i henhold til denne lov, skal sættes i fond, der er kommunens ejendom, og forbrug af fonden skal kun ske med landsstyrets tilladelse og i reglement, der er godkendt af landsstyret.

§ 7. Landsstýrið góðkennir fíggjarætlanina og kann gera neyðugar broytingar í fíggjarætlanini. Um mett verður, at tær inntøku- ella útreiðslumetingar, sum liggja til grund fyri ta av bygda(r)ráðnum samtyktu fíggjarætlan, eru skeivar ella órímiligar, ella um bygda(r)ráðið hevur samtykt útreiðslur, sum landsstýrið metir, ikki tørvur er á, ella um reglurnar í § 5 í hesi lóg ikki eru fylgdar, kann landsstýrið áleggja kommununi at gera neyðugar broytingar í fíggjarætlanini.

Stk. 2. Um bygda(r)ráðið ikki ger sum álagt av landsstýrinum eftir stk. 1, ger landsstýrið neyðugar broytingar í fíggjarætlanini.

Stk. 3. Ársfíggjarætlanin skal verða góðkend av landsstýrinum í seinasta lagi 15. december.

§ 7. Landsstyret godkender budgettet. Såfremt det vurderes, at de indtægts- eller udgiftsvurderinger, der ligger grund for det af bygderådet vedtagne budget, er forkerte eller urimelige, eller om bygderådet har vedtaget udgifter, som landsstyret vurderer, at der ikke er behov for, eller såfremt reglerne i § 5 i denne lov ikke er overholdt, kan landsstyret meddele kommunerne pålæg om at foretage nødvendige ændringer i budgettet.

Stk. 2. Såfremt bygderådet ikke følger landsstyrets pålæg i henhold til stk. 1, foretager landsstyret nødvendige ændringer i budgettet.

Stk. 3. Årsbudgettet skal være godkendt af landsstyret senest 15. december.

§ 8. Beinanvegin ársfíggjarætlanin er samtykt og góðkend av landsstýrinum, boðar kommunan Toll- og Skattstovu Føroya frá kommunu- og kirkjuskattaprosentinum í kommununi fyri komandi ár og barnafrádráttinum í útroknaða kommunuskattinum.

Stk. 2. Um kommunu- og kirkjuskattaprosentið og barnafrádrátturin ikki eru fráboðað Toll- og Skattstovu Føroya innan 20. december, verða hesi fráboðað av landsstýrinum.

§ 8. Så snart årsbudgettet er vedtaget og godkendt af landsstyret, meddeler kommunen Toll- og Skattstova Føroya kommune- og kirkeskatteprocenten i kommunen for det kommende år og børnefradraget i den udregnede kommuneskat.

Stk. 2. Såfremt kommune- og kirkeskatteprocenten og børnefradraget ikke er meddelt Toll- og Skattstova Føroya inden 15. december, meddeles disse landsstyret.

§ 9. Kommunurnar skulu í fíggjarárunum 1994 og 1995 gjalda inn til ein kommunalan kreppulánsgrunn.

Stk. 2. Upphæddin skal avsetast á fíggjarætlanirnar hjá kommununum og skal vera 1% av teimum inntøkum, sum kommunuskatturin verður roknaður eftir.

Stk. 3. Áðrenn avsett verður eftir stk. 2, verða somu frádráttir gjørdir, sum tá kommunuskattaprosentið verður ásett.

Stk. 4. Áðrenn kommunuskatturin verður útgoldin og endaliga avroknaður kommununum eftir § 83 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, skal Føroya Gjaldstova

§ 9. Kommunerne skal i finansårene 1994 og 1995 indbetale til en kommunal kriselånefond.

Stk. 2. Beløbet skal reserveres på kommunernes budgetter og skal udgøre 1% af de indtægter, som kommuneskatten udregnes efter.

Stk. 3. Forinden fastsættelse sker i henhold til stk. 2, skal de samme fradrag foretages, som når kommuneskatteprocenten fastsættes.

Stk. 4. Forinden kommuneskatten udbetales og endelig afregnes til kommunerne i henhold til § 83 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommu-

afturhalda í kommunuskattinum eina upphædd svarandi til 1 kommunuskattaprosent, smbr. stk. 2.
Stk. 5. Upphæddin, sum verður afturhildin eftir stk. 4 fer í kommunala kreppulánsgrunnin.
Stk. 6. Grunnurin umsitur tann pening, sum verður latin grunninum eftir stk. 5. Peningurin er ogn hjá kommunum, sum hava latið inn í grunnin.
Stk. 7. Grunnurin kann veita lagalig lán til kommunur. Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur um fyrisitingina av og virksemið hjá grunninum og reglur um avtøku av grunninum.

§ 10. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. Lógin hevur við undantaki av §§ 6 og 9 bert gildi til fyri inntøkuárini 1994 og 1995.
Stk. 3. Reglurnar í § 43, stk. 2, 2. pkt., § 46, stk. 7, 2. pkt, § 47, stk. 1, 3. pkt. og § 59 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt og § 29 og § 31, stk. 1 og stk. 2 í løgtingslóg nr. 45 frá 29. juni 1972 um føroysku kommunurnar verða ikki í nýtslu fyri fíggjarárini 1994 og 1995.
Stk. 4. Meðan henda lóg er í gildi, verður dagfestingin 1. oktober í § 41, stk. 2, 1. pkt. og § 43, stk. 1, 1. pkt. í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 broytt til 31. december.

neskat, skal Føroya Gjaldstova tilbageholdé i kommuneskatten et beløb, der svarer til 1 kommuneskatteprocent.
Stk. 5. Beløb, som tilbageholdes i henhold til stk. 4, indgår i den kommunale kriselånefond.
Stk. 6. Fonden administrerer de penge, der indbetales til fonden i henhold til stk. 5. Pengene tilhører de kommuner, der har indbetalt i fonden.
Stk. 7. Fonden kan yde lån til kommuner. Landsstyret fastsætter ved bekendtgørelse nærmere regler om fondens administration og virksomhed og regler om ophævelse af fonden.

§ 10. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.
Stk. 2. Med undtagelse af §§ 6 og 9 er denne lov kun gældende for indtægtsårene 1994 og 1995.
Stk. 3. Reglerne i § 43, stk. 2, 2. pkt., § 46, stk. 7, 2. pkt., § 47, stk. 1, 3. pkt. og § 59 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat og § 29 og § 31, stk. 1 og stk. 2 i lagtingslov nr. 45 af 29. juni 1972 om de færøske kommuner anvendes ikki i finansårene 1994 og 1995.
Stk. 4. Medens denne lov er i kraft, ændres dateringen 1. oktober i § 41, stk. 2, 1. pkt. og § 43, stk. 1, 1. pkt. i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 til 31. december.

Tordur J. Niclasen førir annars fram:

Hvat lánsskyldum kommununa viðvíkir, eigur at havast í huga, at landsstýrið sum kommunalt eftirlit hevur givið loyvi til hesi, og sostatt eigur medábyrgd av trongstøðuni, nógvar kommunur eru komnar í.

Summar kommunur hava stórar útreiðslur beinleiðis stavandi frá "landsfløgum". Her skal sum dømi nevnast Leirvíkar og Vestmanna, sum árliga skulu av við milliónа uppnæddir í rentum og avdrátti fyri fløgur í ferjuíegu.

At nevndu kommunur - og aðrar - eru skuldartyngdar orsakað "landsfløgur", eigur at hava við sær, at landsstýrið átekur sær hesar ábyrgdir.

Hvat ferjulegunum viðvíkur, átti ein landsyvirtøka at verið framd.

Hetta er ein fortreyt fyri, at t.d. nevndu kommunur skulu hava nakran sum helst møguleika fyri at klára seg, sjálvt eftir at kreppuláns- og veðhaldsgrunnur er komin at virka, og at ein umfigging av lánum við 7% rentu og 20 ára avdráttartíð er farin fram.

Vísandi til nevndu viðmerkingar verður lagt fram soljóðandi

U p p s k o t

I **Heitt verður á landsstýrið at virka fyri serloysnum galdandi tær kommunur, ið fíggjarliga eru tyngdar orsakað "landsíløgur".**

II **Heitt verður á landsstýrið at fremja yvirtøku av ferjuløgunum í Leirvík og Vestmanna.**

2. viðgerð 23. november 1993. Lógaruppskotið frá fíggjarnevndini í staðin fyri uppskot landsstýrisins samtykt við 19-0 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins burturfallið. Uppskotini frá Tordi J. Niclasen fullu við ávikavist 6-0 og 7-1 atkvøðum.

3. viðgerð 25. november 1993. Jógvan Sundstein, Lisbeth L. Petersen, Jógvan við Keldu og Finnbogi Arge løgdu fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

Í uppskotinum frá fíggjarnevndini verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 3 verður aftan á orðið "kontoskipan" sett:
"kunnu".
2) Í § 5 ganga út orðini: "og avdráttir".
3) Í § 9, stk. 2, verður "1%" broytt til: 0,75%" og í stk. 4 verður 1 kommunuskattaprosent" broytt til: "0,75 kommunuskattaprosent".
4) § 9, stk. 7 verður orðað soleiðis:
"Grunnurin kann veita lán til kommunur. Eftir reglum, ásettum av landsstýrinum velja føroysku kommununrnar í felag eina 5-mannanevnd at fyrisita grunninum. Nevndin ásetir í reglugerð nærri reglur um fyrisitingina av og virksemi hjá grunninum og reglur um

I finansudvalgets forslag foretages følgende ændringer:

1) I § 3 indsættes efter ordet "kontoplanen": "kan".
2) I § 5 udgår ordene "og afdrag".
3) I § 9, stk. 2, ændres "1%" til: "0,75%" og i stk. 4 ændres "1 kommuneskatteprocent" til "0,75 kommuneskatteprocent".
4) § 9, stk. 7 får følgende ordlyd:
"Fonden kan yde lån til kommuner. Efter regler, fastsat af landsstyret, vælger de færøske kommuner i fællesskab en bestyrelse af 5 medlemmer, der skal administrere fonden. Bestyrelsen udarbejder vedtægter om fondens administration og virksomhed og om fondens ophør. Landsstyret

avtøku av grunninum. Landsstýrið skal góðkenna reglugerðina."

skal godkende vedtægterne."

Broytingaruppskotið frá Jógvan Sundstein v.fl. fall við 12-0 atkvøðum.

Fíggjarnevndin legði fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

Endamálið við broytingini er at gera tað heilt greitt, at bert avlop av rakstrinum, ið stavar frá hækkaðum skattaprosenti upp til 16% skal fara í kommunala ognargrunnin, og setir fíggjarnevndin fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til uppskot fíggjarnevndarinnar

Í § 6. 1. punktum verður aftan á orðini "av hækkaðum skattaprosenti" sett: "upp til 16".

I § 6. 1. punktum indsættes efter ordene "af forhøjet skatteprocent": "op til 16".

Broytingaruppskot frá fíggjarnevndini til § 6. 1. punktum samtykt við 29-0 atkvøðum. Lógin soleiðis broytt endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

Lóg nr. 189 frá 8. desember 1993.

FL jnr. 812-52/93.

28 Veðhald fyri lánum til Húsalánsgrunnin

Ár 1993, mikudagin 20. oktober legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um veðhald fyri lánum til Húsalánsgrunnin.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri 2 uttanlandslánum til Húsalánsgrunnin uppá tilsamans 184 mió. kr. ella mótvirðið av hesum í fremmandum gjaldoyra.

§ 2. Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om garanti for lån til Húsalånsgrunnin.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for 2 udenlandslån til Húsalånsgrunnin på ialt 184 mio. kr. eller modværdien af nævnte beløb i fremmed valuta.

§ 2. Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

30. juli í ár søkti Húsalánsgrunnurin landsstýrið um landskassaveðhald fyri restskuldina av 2 uttanlandslánum til Húsalánsgrunnin. Talan er um lán uppá ávikavist 145 mió. kr. og 44 mió. kr. ella 189 mió. kr. tilsamans. Restskuldin av hesum lánum er 184 mió. kr. Lánini hava garantitrygging frá ávikavist Tryggingarsambandinum Føroyar og Topdanmark Garanti. Hesir báðir stovnarnir hava treytað sær, at eginogn grunsins ikki fer niður um 33 1/3% av samlaðu útlánunum. Tryggingarsambandið Føroyar og Topdanmark Garanti hava boðað Húsalánsgrunninum frá, at hesir báðir stovnarnir eru sinnaðir at sleppa kravinum um 33 1/3% í eginpeningi, um so er, at landskassaveðhald verður veitt fyri restskuldini.

Sambært pkt. 3 í avtaluni millum Føroya Landsstýri og donsku ríkisstjórnina frá 12. oktober í ár tekur ríkisstjórnin til eftirtektar, at landskassaveðhaldið verður veitt Húsalánsgrunninum fyri restskuldina av omanfyri nevndu uttanlandslánum.

Vísandi til at eitt landskassaveðhald ber í sær, at garantiprovisjónin og eginpeningskravið falla burtur, skjýtur landsstýrið upp, at landsstýrið landskassans vegna fær heimild til at veðhalda fyri restskuldini av 2 lánum til Húsalánsgrunnin uppá tilsamans 184 mió. kr. ella mótvirðið av hesum í fremmandum gjaldoyra.

1. viðgerð 2. november 1993. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 19. november 1993 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 20. oktober 1993 og eftir 1. viðgerð 2. november 1993 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hildið fund við Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann í íbúðarmálum og við Jóannes Dalsgarð, stjóra fyri Húsalánsgrunnin.

Landsstýrismaðurin og stjórin fyri Húsalánsgrunnin greiddu fíggjarnevndini frá málinum. Stjórin fyri Húsalánsgrunnin upplýsti, at tryggingarfeløgini høvdu sett fram krøv um ríkisveðhald. Landsstýrismaðurin upplýsti, at hann frá forsætismálaráðnum varð vorðin kunnaður um, at í slíkum spurningum nú, verður landskassaveðhald mett eins gott. Víðari greiddu landsstýrismaðurin og stjórin frá, at um landsstýrið vil veita landskassaveðhald, kann kravið um 33 1/3% eginogn verða slept.

Upplýst varð, at umframt tær 10 mió.kr., sum játtaðar eru Húsalánsgrunninum á landsstýrisuppskotinum til fíggjarløgtingslóg fyri 1994, skal grunnurin hava helmingin av teim 30 mió.kr. til almennar grunnar, sum nevndar eru í avtalum millum ríkisstjórnina og Føroya Landsstýri frá 12. oktober 1993. Landsstýrismaðurin helt, at játtanin til Húsalánsgrunnin eigur at koma upp á einar 80 mió.kr., t.v.s. at enn resta 55 mió.kr. f. Víðari segði landsstýrismaðurin, at landsstýrið fer at royna at ávísa sparingar á fíggjarlógini fyri 1994 soleiðis, at nevnda upphædd verður fingin til vega.

Viðvíkjandi støðuni hjá sethúsaeigarunum varð upplýst, at arbeitt verður við at samskipa saneringina av sethúsalánunum soleiðis, at allir lángevarar (sparikassarnir, bankarnir og húsalánsgrunnurin) koma at arbeiða saman í hesum spurningi.

Fyri at Húsalánsgrunnurin skal luttaka í hesum, er neyðugt at styrkja um fíggjarstøðu grunsins soleiðis, sum landsstýrismaðurin mælir til. Nevndin tekur eisini undir við, at arbeiðið við at sanera sethúsalán verður samskipað.

Fíggjarnevndin ásannar, at um Tryggingarsambandið Føroyar og Topdanmark Garanti taka síni veðhald fyri hesum báðum lánum aftur, førir hetta uttan iva til, at øll lánini hjá Húsalánsgrunninum verða uppsøgd við tí úrsliti, at grunnurin fer á húsagang.

Út frá hesum tekur **ein samd nevnd** undir við uppskoti landsstýrisins og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 23. november 1993. Uppskotið samtykt við 27-0 atkvøðum.

3. viðgerð 25. november 1993. Uppskotið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

Lóg nr. 188 frá 8. desember 1993.

FL jnr. 2301-3/90.

29 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan

Ár 1993, mikudagin 20. oktober legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verða hesar broytingar gjørdar:

1) Í § 5, stk. 1 verður ordingin "nr.8 til 15 " broytt til: "nr.8 til 16".
2) § 5, stk. 2, pkt. 1 verður orðað soleiðis:
"Hjá partafeløgum, smápartafeløgum, sparikassum og lutafeløgum, sum nevnd eru í stk. 1 og sum hava partapening, ábyrgdarpening ella lutapening, sum er 300.000 kr. ella meira, verður skatturin ásettur til 22 % av inntøkunum til landskassa og kommunur."

§ 2.

Hendan lóg fær gildi 1. januar 1994.
Stk.2. Broyting nr. 2 hevur gildi fyri tey nevndu feløg, sum við endan av roknskaparskeiði teirra, tó fellur saman við ella endar í álmanakkaárinum 1993 ella seinni, hava ein partapening, ábyrgdarpening ella lutapening uppá 300.000 kr. ella meira.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fastsættelse af skat til landskassen.

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 af 1.september 1983 om fastsættelse af skat til landskassen med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 5, stk. 1, ændres "nr. 8 til 15" til: "nr.8 til 16".
2) § 5, stk. 2. pkt. 1 affattes således:
"For aktieselskaber, anpartsselskaber, sparekasser og andelsselskaber, der er nævnt i stk.1 og som har en aktiekapital, garantikapital ella andelskapital på 300.000 kr. eller mere, udskrives skatten til 22 % af indtægten til landskasse og kommune."

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1994.
Stk. 2. Ændring nr. 2 har virkning for de nævnte selskaber, som ved slutningen af deres regnskabsperiode, der falder sammen med eller ender i kalenderåret 1993 eller senere, har en aktie- eller andelskapital på 300.000 kr. eller mere.

Viðmerkingar:

Sí felagsviðmerkingar í løgtingsmáli nr. 30/1993: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

1. viðgerð 27. oktober 1993. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. november 1993 legði fram soljóðandi

Álit

Sí felagsálit í løgtingsmáli nr. 30/1993: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

2. viðgerð 25. november 1993. Uppskotið Samtykt við 20-0 atkvøðum.

3. viðgerð 2. desember 1993. Uppskotið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

Lóg nr. 195 frá 10. desember 1993.

30 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1993, hósdagin 21. oktober 1993 legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd hendan broyting:

Í § 1 verður sum nýtt nr. 16) sett:
"Sparikassar, ið hava fast rakstrarstað í Føroyum."

§ 2.

Hendan løgtingslóg fær gildi 1. januar 1994.

§ 3.

Fyri teir skattskyldugu sparikassar, sum eru nevndir í § 1, nr. 16) eru hesar skiftisreglur galdandi:

1) Tað skattaár, sum ein sparikassi fyrstu ferð verður skattskyldugur eftir reglunum í hesi lóg, verður nevnt skiftisskattaárið.

2) Fyri skiftisskattaárið verða maskinur, innbúgv og líknandi rakstrargøgn, sum sparikassin eigur við byrjan inntøkuársins, settar til saldovirði, sbr. lóg um skattligar avskrivingar

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændring:

I § 1 indsættes som nyt nr. 16):
"Sparekasser, der har fast driftssted på Færøerne"

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1994

§ 3.

For de i § 1 nr. 16) skattepligtige sparekasser gælder følgende overgangsregler:

1) Det skatteår, for hvilket en sparekasse første gang beskattes efter reglerne i nærværende lov, benævnes i det følgende overgangsskatteåret.

2) For overgangsskatteåret indgår maskiner, inventar og lignende driftsmidler, som sparekassen ejer ved indkomstårets begyndelse, i saldoværdien jfr. lov om skattemæssige afskrivninger m.v (afskrivningslov-

v.m. (avskrivingarlógin), við tí virðinum, sum tey eru sett til í sparikassans almennu roknskapum fyri tað seinasta árið frammanundan skiftisskattaárinum. Henda upphædd verður hækkað við útveganarupphæddini fyri rakstrargøgn, sum eru útvegað í inntøkuárinum, og lækkað við upphædd, sum í sama tíðarskeiði er vunnið við sølu av rakstrargøgnum, alt sambært reglunum í avskrivingarlógini.

3) Fyri bygningar, sum kunna verða avskrivaðir sambært avskrivingarlógini, ella innleggingar í hesum bygningum, og sum eru ognaðir ella liðugtbygdir áðrenn byrjanina av tí inntøkuári, sum er grundarlagið fyri skattaásetingini fyri skiftisskattaárið og fylgjandi skattaár, verður avskrivað fyri skiftisskattaárið og fylgjandi skattaár við prosentparti av útveganarvirðinum. Støðið verður tikið í teimum veruligu útveganarárunum.

4) Í sambandi við sparikassans uppgerð av vinningi ella tapi av virðisbrøvum verður útgangsstøði tikið í kursvirðinum pr. 31.12.1993.

5) Fyri teir í hesi lóg nevndu sparikassar verður skattagrundarlagið í 1994 40 % av skattskyldugu inntøkuni uppgjørd eftir reglunum fyri uppgerð av skattskyldugari inntøku, í 1995 60 % av skattskyldugu inntøkuni, í 1996 80 % av skattskyldugu inntøkuni og í 1997 og framyvir 100 % av skattskyldugu inntøkuni.

6) Skattingin fer annars fram sum viðv. partafeløgum og øðrum skattskyldug feløgum - og verður skattað við prosenti - so sum ásett í § 5 í løgtinslóg nr. 87 frá 1.september 1983 um ásetten), med den værdi, hvor de er ansat i sparekassens offecielle regnskab for det seneste år forud for overgangsskatteåret. Dette beløb forhøjes med anskaffelsessummen for driftsmidler, der er anskaffet i indkomståret, og nedsættes med beløb, der i samme tidsrum er indvundet med afståelse af driftsmidler, alt i overensstemmelse med reglerne i afskrivningsloven.

3) På bygninger, hvorpå der kan afskrives i overensstemmelse med reglerne i afskrivningsloven eller på installationer i disse bygninger, og som er erhvervet eller fuldført forud for begyndelsen af det indkomstår, der ligger til grund for skatteansættelsen for overgangsskatteåret, sker afskrivningerne for overgangsskatteåret og følgende skatteår, med procentdele af anskaffelsesværdien, med udgangspunkt i de faktiske anskaffelsesår.

4) I forbindelse med sparekassens opgørelse af fortjeneste eller tab af værdipapirer er udgangspunktet kursværdien pr. 31.12.1993.

5) For de i denne lov nævnte sparekasser er beskatningsgrundalget i 1994 40 % af den skattepligtige indkomst opgjort efter regler for opgørelse af skattepligtig indkomst, i 1995 60 % af den skattepligtige indkomst, 1996 80 % af den skattepligtige indkomst og i 1997 og fremover 100 % af den skattepligtige indkomst.

6) Beskatningen foretages ellers som - og med samme procent - som fastsat for aktieselskaber og andre skattepligtige selskaber i § 5 i lagtingslov nr. 87 af 1.september

ing av skatti til landskassan.

1983 om fastsættelse af skat til landskassen.

Viðmerkingar:

Við lóg nr. 246 frá 3. mai 1993 um bankar og sparikassar eru sparikassar frá 1. januar 1994 í veruleikanum undir somu reglum viðvíkjandi vinnuligum virksemi sum bankar. Bankarnir, sum eru partafeløg, eru higartil blivnir skattaðir eftir somu reglum, sum galda fyri onnur partafeløg. Hinvegin eru sparikassar, sum eru sjálveigandi stovnar, higartil slopnir undan skatseting.

Landsstýrið heldur tað nú verða rímiligt, at tann javnstøða av bankum og sparikassum, sum er hend við lógini um bankar og sparikassar, eisini verður fylgt við eini skattligari javnstøðu.

Landsstýrið skjýtur upp, at sparikassar frá 1. januar 1994 verða skattaðir eftir somu reglum sum partafeløg, tó við skiftisreglum inntil 1. januar 1997. Uppgerð av inntøku og ogn verða tí nú eftir somu reglum, sum eru galdandi fyri bankar.

Eftir uppskotinum skal lógin koma í gildi 1.januar 1994. Hetta førir við sær, at allar inntøkur, sum verða vunnar av sparikassum eftir hendan dag, koma undir skatuskyldu. Tó so, at skattingin ikki verður í fullum vavi frá fyrsta degi, men fer fram í stigum yvir 4 ár. Eftir uppskotinum verða tað í 1994 tí bert 40 % av tí upphædd, ið eftir vanligum reglum vildi verið skattskylduga inntøkan, ið koma undir skatting, og tá við vanliga skattaprosentinum galdandi fyri feløg, t.v.s sum nú 22%, um tá ábyrgdarpeningurin er yvir 300.000 kr. Við øðrum orðum verður skatturin 22% av teim 40% av skattskyldug inntøkuni. Skatta-grundarlagið verður síðan hækkað við 20 % fyri hvørt ár, inntil øll skattskylduga inntøkan er komin undir skattin í 1997

Tað er torført at meta um, hvussu nógv skattsetingin av sparikassum gevur landskassanum.

Við tað at sparikassar higartil hava verið undantiknir skattskyldu, eru roknskapirnir fyri sparikassar neyvan altíð settir upp við atliti til inntøkuuppgerð, sum svarar til reglurnar í skattalóggávuni.

Harafturat kemur, at skiftistíðin inntil full inntøkuskatting verður veruleiki, kann hugsast at ávirka tær fíggjarligu dispositiónirnar hjá sparikassunum, t.d. tær skattligu avskrivingarnar.

Eisini kunnu kursbroytingar av virðisbrøvum hjá sparikassunum fáa stóran týdning fyri tað roknskaparliga úrslitið, sum er støðið undir skattaútrokningini.

Landsstýrið metir inntøkuna frá hesum uppskoti til 4 milliónir krónur.

Nevnast kann eisini í hesum sambandi, at landsstýrið í næstum fer at endurskoða kunngerðina um skattliga avseting móti tapi hjá peningastovnum.

1. viðgerð 27. oktober 1993. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. november legði fram soljóðandi

F e l a g s á l i t

í

løgtingsmáli nr. 29/1993: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan og løgtingsmáli nr. 30/1993: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Málini eru løgd fram av landsstýrinum tann 21. oktober 1993 og eftir 1. viðgerð 27. oktober 1993 beind í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málini og hevur undir viðgerðini havt fund við Toll- og Skattstovu Føroya. Eisini hevur nevndin havt fund við Finnboga Ísakson, landsstýrismann.

Omanfyri nevndu løgtingsmál eru tengd saman og skuldu tilsamans tørt við sær, at sparikassarnir í Føroyum pr. 1. januar 1994 koma undir skattskyldu sum aðrir peningastovnar í Føroyum.

Ivamál hevur verið reist um ætlanin er, at dupultskatta rentuinntøkur sparikassans, men fyri at beina burtur henda iva, so er borið fram, at lógin um rentuskatt sjálvsagt verður tillagað hesum broytingum, so sparikassar ikki bæði rinda 22% rentuskatt og vanligan felagsskatt av rentuinntøku úr Føroyum. Uppskot til hesar lógarbroytingar í rentuskattalógini er undir viðgerð, og væntast kann, at hesin spurningur verður avgreiddur um stutta tíð, samstundis sum avgerð verður tikin um, hvussu skattingin av rentuinntøkum hjá felagum framyvir skal fara fram, t.v.s. við serligari skattafyriskipan ella sum partur av vanligu skattskyldugari inntøkuni.

Undir viðgerðini í nevndini er komið fram, at sparikassarnir einki høvdu í móti at gerast fult skattskyldugur frá 1. januar 1994, og landsstýrið hevur fráboðað nevndini, at landsstýrið helst einaferð í næstu viku fer at leggja fram uppskot til broyting í rentuskattalógini, ið staðfestir, at øll rentuinntøka sparikassans gerst partur av vanligu skattskyldugu inntøkum teirra, tó so, at sparikassans ognir og inntøkur, ið fevndar eru av lógini um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald, enn koma undir avgjaldsskyldu.

Stavivilla er í § 1 í løgtingsmáli nr. 30/1993, í orðinum rakstrarstað manglar eitt r. Í orðinum rakstrargøgnum í § 3, nr. 2 á 3. síðstu linju manglar eitt g.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minniluttar.

Meirilutin (Lasse Klein, Heini O. Heinesen og Eyðálvur Dimon) mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við niðanfyristandandi broytingum til løgtingsmál nr. 30/1993: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt og setur tí fram soljóðandi

broytingaruppskot

1) § 3 nr. 5 verður orðað soleiðis:
"Fyri teir í hesi lóg nevndu sparikassar fer skatting fram, so sum fyriskrivað er í § 5 stk. 2 í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan, við skattagrundarlagi uppgjørt eftir reglum, sum galdandi eru fyri onnur skatuskyldug feløg og við sama procenti, sum galdandi er fyri hesi."

2) § 3 nr. 6 verður strikað.

1) § 3 nr. 5 affattes således:
"For de i denne lov nævnte sparekasser foretages beskatningen, så som forskrevet er i § 5 stk. 2 i lagtingslov om fastsættelse af skat til landskassen med beskatningsgrundlag, der opgøres efter samme regler som gældende for andre skattepligtige selskaber, og med samme skatteprocenter, som er gældende for disse."

1) § 3 nr. 6 udgår.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) vísir til álitið í tingmáli nr. 19/1993. Hann tekur tó undir við, at sparikassar og smá partafeløg koma undir vanligu partafelagsskipanina. Teytin er tó sjálvandi tann, at sparikassar ikki koma undir rentuskattaskipanina.

Minnilutin (Finnbogi Arge) vísir til álitini í tingmáli nr. 26 og tingmáli nr. 19.

Minnilutin kann taka undir við, at smá partafeløg og sparikassar koma undir vanliga partafelagsskattin.

2. viðgerð 25. november 1993. Broytingaruppskot frá meirilutanum samtykt við 17-0 atkvøðum, uppskot landsstýrisins soleiðis broytt samtykt við 17-0 atkvøðum.

3. viðgerð 2. desember 1993. Uppskotið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

Lóg nr. 197 frá 10. desember 1993.

31 Uppskot til samtyktar um áheitan til forsætismálaráðharran um kanning av teimum føroysku bankunum

Ár 1993, mikudagin 20. oktober setti Helena Dam á Neystabø, løgtingsmaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Ásannandi, at løgting og landsstýri hava noyðst at tikið ovurhonds stór lán til tess at endurreisa Sjóvinnubankan og Føroya banka og soleiðis bjarga bankaskipanini, og somuleiðis ásannandi, at fyrisitingin av bankaskipanini er ríkismál og ikki heimastýrismál, samtykkir Føroya Løgting at heita á forsætismálaráðharran um at skipa fyri, at serkøn nevnd verður sett at kanna øll tey viðurskifti og tær orsøkir, sum hava ført nevndu bankar í fíggjarligt óføri, og skriva almenna frágreiðing á sama hátt, sum gjørt varð í 1952 - sambært ríkisíóg nr. 47 frá 22. februar um endurreising av Sjóvinnubankanum - í "Beretning angående Sjóvinnubankin".

Viðmerkingar:

Í sambandi við uppskotið til samtyktar hevur uppskotsstillarin hesar viðmerkingar:

12. oktober í ár hevur Føroya Landsstýri gjørt avtalu við donsku stjórnina um, at landsstýrið aftur skal seta ábyrgdarpening í bankarnar, hesa ferð 1,3 milliardir. Tá Føroya Løgting nú aftur skal til at játta milliardalán at seta í bankarnar, er einki náttúrligari, enn at Føroya Løgting og Føroya fólk fáa innlit í tey viðurskifti, sum hava havt hesa øgiligu skuldarbinding við sær. Alt annað vildi verið ábyrgdarleyst av løgtinginum. Kanningin og frágreiðingin skulu hjálpa til at tryggja bankaskipanina framefir og fyribyrgja, at vit enda aftur í somu støðu, sum nú.

Uppskotsstillarin heitir samstundis á tingið um at fáa hetta uppskot samtykt sum skjótast, so at forsætismálaráðharin fær áheitanina, áðrenn fólkatingið fer at viðgera avtaluna frá 12. oktober.

1. viðgerð 29. oktober 1993. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 16. november legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av Helenu Dam á Neystabø, løgtingsmanni, tann 2. oktober 1993 og eftir 1. viðgerð 29. oktober 1993 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið.

Eisini hevur nevndin havt til viðgerðar løgtingsmál nr. 36 um eina kanning av samanleggingini av Sjóvinnubankanum og Føroya Banka. Hóast tað í báðum førum snýr seg um at kanna bankaviðurskifti í Føroyum, metir nevndin, at málini eru so mikið ymisk í vavi og í tíðarskeiði, at tað er rættast, at tey verða avgreidd í løgtinginum hvørt sær.

Ein samd nevnd metir, at kanningin verður at avmarka til áttatiárini og fram til í dag.

Kanningin skal geva innlit í tey viðurskifti hjá bankunum, sum hava havt hesa øgiligu skuldarbinding við sær og eigur eisini at fevna um leiklutin hjá Den Danske Bank og fíggjareftirlitinum.

Tað eigur at verða kannað, um bankarnir hava handlað í stríð við lóggávuna.

Eisini eigur at verða kannað, hvørja ávirkan gongdin í samfelagnum hevur havt á bankarnar.

Sum gongdin hevur verið hetta seinasta árið, metir nevndin, at tað hevur týdning, at kanningin, sum heitt verður á forsætismálaráðharran at gera, verður óheft av bæði teimum føroysku bankunum eins væl og av Den Danske Bank, Finanstilsynet og Danmarks Nationalbank. Uppskotið til samtyktar verður tí broytt soleiðis, at hetta ynski um, at kanningin verður óheft, kemur við í uppskotið.

At uppskotið til samtyktar vendir sær til forsætismálaráðið er av teirri grund, at fyrisitingin av bankaskipanini í Føroyum er eitt ríkismál og ikki eitt heimastýrismál.

Samsvarandi hesum setir **ein samd nevnd** fram sama uppskot til samtyktar við uppískoytinum, sum so verður soljóðandi:

U p p s k o t

til

samtyktar

Ásannandi, at løgting og landsstýri hava noyðst at tikið ovurhonds stór lán til tess at endurreisa Sjóvinnubankan og Føroyu banka og soleiðis bjarga bankaskipanini, og somuleiðis ásannandi, at fyrisitingin av bankaskipanini er ríkismál og ikki heimastýrismál, samtykkir Føroya Løgting at heita á forsætismálaráðharran um at skipa fyri, at serkøn nevnd verður sett at kanna tey viðurskifti og tær orsøkir, sum hava ført nevndu bankar í fíggjarligt óføri, og skriva almenna frágreiðing á sama hátt, sum gjørt varð í 1952 - sambært ríkislóg nr. 47 frá 22. februar um endurreising av Sjóvinnubankanum - í "Beretning angående Sjóvinnubankin".

Nevndin, sum verður sett at gera kanningina, skal vera óheft av bæði føroysku bankunum eins væl og av Den Danske Bank, Finanstilsynet og Danmarks Nationalbank.

2. viðgerð 23. november 1993. Uppskotið frá samdari nevnd endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

32 Íløgustuðul til at roykja fisk og samráðingar við EF um at hækka loftið á fiski úr Føroyum og kanna møguleikarnar fyri eini tollunión

Ár 1993, mikudagin 27. oktober legði kristiligi fólkaflokkurin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokkur fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

I. **Landsstýrinum verður álagt at gera uppskot um íløgustuðul til at roykja laks, hýsu og svartkalva og leggja uppskotið fyri løgtingið í hesi tingsetuni.**

II. **Landsstýrinum verður álagt at taka upp samráðingar við EF um at hækka loftið fyri fisk úr Føroyum og kanna møguleikarnar fyri eini tollunión.**

Viðmerkingar:

Eitt slag av virkisloysi tykist at ráða í landi okkara og tjóð. Fígging er ring at fáa hendur á.

Fá eru tey, ið sjálvi hava pengar til at fara undir nakað. hug og dirvi, sum støðan er. Arbeiðsloysið minkar tí ikki.

Tað er átrokandi, at gongd fæst á. Tað er neyðugt, at vinnuhjólini aftur fara at mala, og fleiri fólk koma í abeiði.

Ein av møguleikunum er at stuðla góðsking av tí nógva alifiskinum, sum í dag verður útfluttur óvirkaður, bert kruvdur og reinsaður. Laksurin kann verða royktur, skorin sundur og vakumpakkaður her tað sama sum í Danmark ella øðrum landi. Tá fáa vit dupult so nógvan prís fyri hann. Tað sama kann eisini verða gjørt við hýsu og svartkalva.

Sambært handilsavtalunum kann íløgustuðul verða veittur. Tað vil minka um kapitalkostnaðin hjá virkjunum, sum higartil hava verið alt ov dýr. Tá verður rentukostnaðurin eisini minni. Hann hevur beint fyri nógvum virkjum og noyðist niður.

Eina hóming av, hvussu stórt tal av fólki aftur kann koma í arbeiði, um farið verður undir at roykja laks, hýsu og svartkalva, fáa vit við at hyggja eftir tølunum fyri aldum laksi tey seinastu árini.

Bæði í 1991 og 1992 tóku føroyingar góð 16.000 tons av aldum sílum og laksum, sum vórðu útfluti fyri o.u. 600 mió.kr. hvørt árið. Tað ber til at hækka útflutningstalið í krónum til tað dupulta við at roykja fiskin og gera hann borðbæran, og sjálvari alingini ber eisini til at fáa meira burturúr við at fara longur út.

100 tons av royktum fiski geva 15 ársverk. Seta vit talið til 15.000 tons. sum roykt kann verða av laksi. hýsu og svartkalva. hevur hetta 2.250 nýggj størv.

Tað skal ikki nógv íløga til fyri at fáa øll hesi nýggju størvini. sum støðan er í landinum. Flakavirkini hava vit. fleiri standa stongd. Tey hava útgerð til frysting og kunnu lættliga fara undir at roykja fisk. Roykiovnur kostar 800.000 kr.. sum kann roykja 2 - 2,5 tons um samdøgrið. Best er við tveimum sovorðnum ovnum. sum saman við skeri- og pakkitólum. vognum og saltimaskinu kostar einar 3 mió. kr.

Fyri hesa íløgu ber til at táa flakavirkini í gongd aftur. sum eru steðgað. og nógv fólk aftur í arbeiði, sum í dag ganga arbeiðsleys og ongan annan møguleika vita sær enn at flyta av landinum.

EF-sáttmálin kann verða ein trupulleiki fyri royktan fisk. Hann gevur okkum loyvi til 1000 tons av royktari vøru. til vit rena okkum í loftið og kunnu táa 13% í tolli. Tað er serstakliga marknaðin fyri royktum vørum. framleiðarar í EF vilja hava fyri seg sjálvar. ikki minst danir.

So lítið er framleitt í ár av royktum vørum. at vit táa ilt við at náa bara tey 1000 tonsini til EF-marknaðin.

Men kemur gongd á hesa framleiðslu. er neyðugt beinanvegin at taka upp samráðingar um at hækka loftið fyri fisk úr Føroyum. Henda møguleikan hava vit í sátumálanum.. og danska stjórnin sigur í avtaluni frá 12. oktober seg framhaldandi vilja stuðla føroyingum til at fáa eina betri handilsavtalu. so at føroysk framleiðsla kann kappast á jevnum føti á tí europeiska marknaðinum.

Ein annar møguleiki fyri at fáa uppaftur fleiri hendur í arbeiði her á landi. er fiskurin úr øðrum londum. sum kann verða virkaður á flakavirkjum okkara. Hesin tykist ikki at vera nakar trupulleiki at fáa hendur á. um pengar vóru.

Trupulleikin liggur her í vantandi fígging og ringum marknaðarviðurskiftum. tí at ikki sleppst inn á EF-marknaðin við úrdráttum úr 3-landsvøru uttan at gjalda upp til 20% í tolli.

Ein tollunión av tí slagi. sum EF hevur við fleiri onnur lond ella landspartar. sum hoyra til eitt EF-land. hevði opnað fyri nógvum møguleikum á virkjum okkara. Tí eigur at verða kannað. um tað ber okkum til at fáa eina sovorðna skipan. uttan at vit missa samráðingarrættin og nakað av tí sjálvsavgerðarrætti. sum vit hóast alt enn hava eftir.

1. viðgerð 2. november 1993. Málið varð beint í íðnaðarnevndina. sum 27. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnutlokki tann 27. oktober 1993 og eftir 1. viðgerð 2. november 1993 beint í íðnaðarnevndina.

Uppskotið til samtyktar er í tveimum. Í fyrra partinum verður skotið upp. at áleggja landsstýrinum at gera uppskot um íløgustuðul til at roykja laks. hýsu og svartkalva og leggja

uppskotið fyri løgingið í hesi tingsetuni. Í seinna partinum verður skotið upp at áleggja landsstýrinum at taka upp samráðingar við EF um at hækka loftið fyri fisk úr Føroyum og kanna møguleikarnar fyri eini tollunión.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fund við umboð fyri roykivinnuna, sum greiddu frá, at vinnan í løtuni hevur trupulleikar at fáa neyðuga goymslu- og rakstrarfígging. Umboðini fyri vinnuna hildu ikki, at fyriliggjandi uppskot um íløgustuðul er rætta leið at ganga, tí vinnan heldur ikki, at tað er rætt at geva beinleiðis stuðul, men vil heldur láta fríu marknaðarkreftirnar ráða.

Viðvíkjandi seinna partinum av uppskotinum vísir nevndin á, at eru samráðingar millum Føroyar og ES um fleiriættir í handilssáttmálanum, men eru hesar samráðingar ikki at enda komnar enn. Nevndin vísir annars á álit frá marknaðarnevndini í tingmáli nr. 57/1993: Samráðingar við EF um treytir fyri limaskapi.

Nevndin setir einki uppskot fram.

2. viðgerð 28. apríl 1994. Uppskotini I og II fullu við ávikavist 10-0 og 8-0 atkvøðum.

33 Løgtingslóg um lønarhæddaravgjald

Ár 1993, hósdagin 21. oktober legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um lønarhæddaravgjald.

I. Avgjaldsskyldug virki

§ 1. Avgjald verður goldið til landskassan av hesum virkjum, sum móti samsýning lata tænastur:

1. Læknavirksemi, tannlækna- og annað dentalvirksemi, kiropraktik, fysioterapi og onnur verulig heilsurøkt.
2. Tryggingarvirksemi.
3. Banka-, sparikassa- og fíggjarvirksemi.

2. stk. Avgjaldsskyldan eftir stk. 1 fevnir tó ikki um: Føroya Ídnaðargrunnur, Færøernes Realkreditinstitut, Húsalánsgrunnurin, Jarðargrunnurin, Menningargrunnur Ídnað og Fíggargrunnurin frá 1992.

§ 2. Verandi virki, sum eru avgjaldsskyldug, skulu verða skrásett hjá Toll- og Skattstovu Føroya.

§ 3. Toll- og Skattstova Føroya útlýggjar virkjum, fráboðan um at tey eru skrásett eftir § 2.

2. stk. Fráboðan til skrásetingar skal fara fram í seinasta lagi 8 dagar, áðrenn virkið byrjar. Broytingar í skrásetingarviðurskiftunum skulu verða fráboðaðar í seinasta lagi 8 dagar aftaná, at broytingin er gjørd.

lagtingslov om afgift af lønsum.

I. Afgiftspligtige virksomheder

§ 1. Der betales en afgift til landskassen af følgende virksomheder, der mod vederlag leverer ydelser:

1. Lægevirksomhed, tandlæge-og anden dentalvirksomhed, kiropraktik, fysioterapi og anden egentlig sundhedspleje.
2. Forsikringsvirksomhed.
3. Bank-, sparekasse- samt finansieringsvirksomhed.

Stk. 2. Afgiftspligten efter stk. 1, omfatter dog ikke: Føroya Ídnaðargrunnur, Færøernes Realkreditinstitut, Húsalánsgrunnurin, Jarðargrunnurin, Menningargrunnur Ídnaðarins og Fíggjargrunnurin frá 1992.

§ 2. Eksisterende virksomheder, der er afgiftspligtige, bliver registreret af Toll- og Skattstova Føroya.

§ 3. Toll- og Skattstova Føroya orienterer virksomhederne om at de er registrerede efter § 2.

Stk. 2. Anmeldelse til registrering skal ske inden 8 dage før virksomhedens begyndelse. Ændringer til registreringsforholdene skal ske inden 8 dage efter at ændringen er sket.

3.stk. Um eitt virki ikki hevur deild ella líknandi her á landi skal tað verða skrásett við einum persóni, sum er búsitandi her á landi, ella við einum virki, sum hevur handilsstað her á landi.

Stk. 3. Hvis en virksomhed omfattet af § 1 ikke har filial eller lignende her i landet, skal virksomheden registreres ved en person, som har bopæl her i landet, eller ved virksomhed der har forretningssted her i landet.

II. Avgjaldssatsurin og avgjaldsgrundarlagið

§ 4. Avgjaldið er 2.5% av avgjaldsgrundarlagnum fyri virki nevnd í § 1. stk. 1 nr. 1.
2.stk. Avgjaldið er 5% av avgjaldsgrundarlagnum fyri virki nevnd í § 1. stk. 1. nr. 2 og 3.

§ 5. Avgjaldsgrundarlagið er fyri tey í § 1. stk. 1, nr.1 nevndu virkjum útgoldna A-løna rupphædd hjá virkinum + avlop av sjálvstøðugum vinnuvirki, gjørt upp eftir reglunum fyri uppgerð av skattskyldugari inntøku.
2. stk. Avgjaldsgrundarlagið er fyri tey í § 1 stk. 1 nr. 2 og 3 nevndu virki útgoldna A-lønarupphæddin hjá virkinum í avgjaldstíðarskeiðnum.
3. stk. Í sambandi við uppgerð av lønarhæddini, skal lønarsamsýning í naturalia viðroknast í lønarhæddina í tann mun, tað gevur rætt til frítíðarendurgjald sambært frítíðarlógini.
4. stk. Virkir, sum bæði hava virksemi eftir § 1. stk. 1 og annað virksemi, skulu grundað á eitt økisuppbýti av virkinum, gera eitt býti av virkisins lønarhædd og yvirskoti ella halli, sum viðvíkir tí avgjaldsskylduga partinum av virkinum, ávikavist restini av virkinum. Landsstýrið kann ásetta nærri reglur fyri uppgerðina av avgjaldsgrundarlagnum eftir 1. og 2.pkt.

II. Afgiftssats og afgiftsgrundlag

§ 4. Afgiften er 2.5% af afgiftsgrundlaget for virksomheder, der er omfattet af § 1 stk. 1 nr. 1.
Stk. 2. Afgiften er dog 5% af afgiftsgrundlaget for virksomheder, der er omfattet af § 1. stk. 1. nr. 2 og 3.

§ 5. Afgiftsgrundlaget for de i § 1 stk 1 nr. 1 nævnte virksomheder er virksomhedens lønsum med tillæg af overskud af selvstændig virksomhed i opgjort efter reglerne om opgørelse af den skattepligtige indkomst.
Stk. 2. Afgiftsgrundlaget for de i § 1 stk. 1 nr. 2 og 3 nævnte virksomheder er virksomhedens lønsum i afgiftsperioden.

Stk. 3. I forbindelse med opgørelse af lønsummen skal aflønning i form af naturalier iregnes lønsummen i det omfang det berettiger til feriegodtgørelse efter ferieloven.
Stk. 4. Virksomheder, der både udøver aktiviteter efter § 1, stk. 1, og andre aktiviteter, skal på grundlag af en sektoropdeling af virksomheden foretage en fordeling af virksomhedens lønsum og overskud eller underskud, der vedrører den afgiftspligtige del af virksomheden, henholdsvis den øvrige del af virksomheden. Landsstyret kan fastsætte nærmere regler for opgørelsen af afgiftsgrundlaget efter 1. og 2. pkt.

III. Uppgerð og inngjalding av avgjaldinum

§ 6. Avgjaldstíðarskeiðið er ársfjórðingarin.
2.stk. Toll- og Skattstova Føroya skal í seinasta lagi 7 dagar aftaná, at avgjaldstíðarskeiðið er úti, senda fyribils uppgerð og krav til avgjaldsskyldugu virki um avgjaldsgrundarlagið og avgjaldsupphæddina.
3. stk. Grundarlagið fyri fyribils ársfjórðingsuppgerðini er útgoldna A-lønarupphæddin og 25% av fyribils skrásettu B-inntøkuni hjá sjálvstøðugt vinnurekandi.

4. stk. Avgjaldið fyri eitt avgjaldstíðarskeið fellur til gjaldingar og skal inngjaldast í seinasta lagi 1 mánaða og 10 dagar aftaná endan á avgjaldstíðarskeiðnum.

5. stk. Verður avgjaldið ikki goldið til tíðina, skal 1.5% gjaldast í mánaðarligari rentu fyri hvønn byrjaðan mánaða frá og við gjaldsmánaðinum at rokna, tó í minsta lagi 100 kr. fyri eitt avgjaldstíðarskeið.
6.stk. Er síðsti rættstundis inngjaldingardagur ein leygardagur, sunnudagur ella halgidagur, verður freistin flutt til fyrsta gerandisdag.
7. stk. Er avgjaldið fyri eitt avgjaldstíðarskeið minni enn 50 kr., kann sleppast undan at gjalda upphæddina.

8. stk. Endaliga uppgerðin og inngjaldingin av avgjaldinum grundað á samlaða avgjaldsgrundarlagið, skal gerast eftir reglunum í § 7.

§ 7. Fyribils uppgerðin og inngjaldingin av avgjaldi eftir § 6, skal regulerast í mun til tað samlaða avgjaldsgrundarlagið hjá virkinum. Reguleringin skal gerast aftaná, at inntøkuárið hjá virkinum er farið. Í sambandi við endaligu skattauppgerðina og inngjaldingina av avgjaldinum, er uppgerðartíðarskeiðið inntøkuárið hjá virki-

III. Opgørelse og indbetaling af afgiften

§ 6. Opgørelsesperioden er kvartalet.

Stk. 2. Toll- og Skatstova Føroya skal senest 7 dage efter udgangen af afgiftsperioden sende foreløbig opgørelse over afgiftsgrundlaget og afgiftsstørrelse, og opkrævning til den afgiftspligtige.
Stk. 3. Grundlaget for den foreiøbige kvartalslige opgørelse er den udbetalte A-indkomst og 25% af den forskudsregistrerede B-indkomst for selvstændig erhvervsdrivende.

Stk. 4. Afgiften for en afgiftsperiode forfalder til betaling og skal betales senest 1 måned og 10 dage efter afgiftsperodens slutning.

Stk. 5. Betales afgiften ikke rettidigt skal der betales 1.5% i månedlig rente for hver påbegyndt måned fra og med fortaldsmåneden at regne, dog mindst 100 kr. for en afgiftsperiode.
Stk. 6. Er sidste rettidig betalingsdag en lørdag, en søn- eller helligdag, udskydes fristen til førstkommende hverdag.

Stk. 7. Er afgiften for en opgørelsesperiode mindre end 50 kr. kan indbetaling af beløbet undlades.

Stk. 8. Endelig opgørelse og indbetaling af afgiften på grundlag af det samlede afgiftsgrundlag, skal gøres efter reglerne i § 7.

§ 7. Den foreløbige opgørelse og indbetaling af afgiften efter § 6, skal reguleres i forhold til virksomhedens samlede afgift. Reguleringen foretages efter udløbet af virksomhedens indkomstår. I forbindelse med den endelige skatteopgørelse og indbetaling af afgiften er opgørelsesperioden virksomhedens indkomstår.

num.
Innkrevjing av írestandi avgjaldi skal gjaldast í seinasta lagi leypandi mánaða og 10 dagar aftaná at kravið er útskrivað.

2. stk. Fer fyribils avgjaldsinngjaldingin hjá virkinum eftir § 6 uppum tað endaliga uppgjørda avgjaldið, verður tað ov nógv inngoldna avgjaldið afturgoldið í seinasta lagi 3 vikur roknað frá síðsta rættstundis innsendan av sjálvuppgávu, um so er, at sjálvuppgávan er innsend rættstundis.

3. stk. Kann Toll- og Skattstova Føroya orsakað av viðurskiftum hjá virkinum ikki kanna avgjaldsgrundarlagið fyri viðkomandi uppgerðartíðarskeið, verður útgjaldingarfreistin avbrotin, inntil viðurskiftini hjá virkinum ikki longur forða fyri eftirliti.

4. stk. Útgjalding fer bert fram, um Toll- og Skattstova Føroya hevur móttikið sjálvuppgávu fyri undanfarin ár.

5. stk. Krav uppá avgjald og møguligar rentur fyri eldri uppgerðartíðarskeið verður mótroknað í sambandi við útgjalding, sjálvt um kravið ikki er forfallið.

6. stk. Afturgjaldingarupphæddir lægri enn 50 kr., verða ikki útgoldnar.

Opkrævning af resterende afgift skal betales senest løbende måned og 10 dage efter at kravet er udskrevet.

Stk. 2. Overstiger virksomhedens foreløbige afgiftsindbetaling efter § 6 den endelige opgjorte afgift, skal den for meget indbetalte afgift tilbagebetales senest 3 uger regnet fra sidste rettidige indlevering af selvangivelse, for så vidt selvangivelsen er indsendt rettidigt.

Stk. 3. Kan Toll- og Skattstova Føroya, grundet forhold hos virksomheden, ikke foretage kontrol af afgiftsgrundlaget for vedkommende afgiftsperiode, bliver udbetalingsfristen afbrudt, indtil forholdene hos virksomheden ikke længere forhindrer kontrol.

Stk. 4. Udbetalingen foretages kun, hvis Toll- og Skattstova Føroya har modtaget selvangivelsen for foregående indkomstår.

Stk. 5. Ikke betalte afgifter og mulige renter for ældre afgiftsperioder, bliver modregnet i forbindelse med udbetaling, selv om afgiften ikke er forfalden til betaling.

Stk. 6. Tilbagebetalinger mindre end 50 kr. bliver ikke udbetalt.

§ 8. Fyriliggur sjálvuppgávan fyri eitt uppgerðartíðarskeið ikki rættstundis, verður avgjaldið hækkað fyri viðkomandi tíðarskeið við 1 %, tó í minsta lagi við 300 kr. og í mesta lagi við 1.000 kr.

2.stk. Toll- og Skattstova Føroya kann frítaka fyri hækking av avgjaldi eftir stk. 1, tá ið serligar umstøður tala fyri hesum.

§ 8. Foreligger selvangivelsen for en opgørelsesperiode ikke rettidigt, forhøjes afgiften for vedkommende periode med 1%, dog mindst med 300 kr. og højst med 1.000 kr.

Stk. 2. Toll- og Skattstova Føroya kan fritage for forhøjelse efter stk. 1 når særlige omstændigheder foreligger.

§ 9. Fyri virkir, sum bert verða rikin í stutta tíð, kann Toll- og Skattstova Føroya áseta, at uppgerðartíðarskeiðið er tað tíðarskeiðið, sum virkið verður rikið í. Toll- og Skattstovan kann somuleiðis fyri tílík virki, stytta um freistirnar fyri at senda

§ 9. For virksomheder der kun drives i kortere tid kan Toll- og Skattstova Føroya fastsætte, at afgiftsperioden er det tidsrum, som virksomheden drives i. Toll- og Skattstovan kan endvidere for sådanne virksomheder forkorte fristerne for ud-

uppgerð og krav út. og fyri at inngjalda avgjaldið.

§ 10. Um eitt virki fleiri ferðir ikki hevur goldið avgjaldið rættstundis, kann Toll-og Skattstova Føroya styrta avgjaldsliðarskeiðið umframt freistina fyri inngjalding av avgjaldinum. Sama er galdandi:

1) Um virki ella tess ánari:
   a) í sambandi við úttøku ikki er førur fyri at rinda sína skuld.
   b) hevur steðgað sínum gjaldingum.
   c) er undir fríari akkord ella likvidatión
   ella
   d) er undir konkursviðgerð ella samráðing er byrjað um tvangsakkord.
2) Um deyðsbúgvið hjá virkisánara verður viðgjørt eftir kapitli III í skiftilógini.

§ 11. Verður staðfest, at eitt virki hevur givið skeiva sjálvuppgávu solciðis at virkið hevur rindað ov lítið í avgjaldi, krevur Toll- og Skattstovan virkið eftir tí skyldugu upphæddini til gjaldingar í seinasta lagi 14 dagar eftir uppkrav.

2.stk. Kann støddin á tí avgjaldi, sum virkið skal rinda, ikki gerast upp við grundarlagi í roknskapum virkisins, ella tí at sjálvuppgávan ikki verður latin inn, kann Toll- og Skattstova Føroya gera eina áseting grundað á meting av avgjaldsgrundarlagnum.

3.stk. Rindað verður eitt gjald uppá 50 kr. fyri áminningarskriv um rindan av avgjaldi.

§ 12. Fyri rindan av avgjaldi eftir hesari lóg heftir tann ið, sum eigari, uppsitari ella líknandi, rekur virkið fyri egna rokning. Er eitt útlendskt virki skrásett við

sendelse af opgørelse og opkrav og indbetaling af afgift.

§ 10. Såfremt en virksomhed gentagne gange ikke har indbetalt afgiften rettidigt, kan Toll- og Skattstova Føroya forkorte afgiftsperioden samt fristen for indbetaling af afgiften. Det samme gælder:

1) Såfremt virksomheden eller dens indehaver:
   a) ved udlæg er fundet ude af stand til at betale sin gæld.
   b) har standset sine betalinger.
   c) er under frivillig akkord eller likvidation eller
   d) er under konkursbehandling eller der er åbnet forhandling om tvangsakkord.
2) Såfremt virksomhedsindehaverens dødsbo behandles efter skiftelovens kapitel III.

§ 11. Konstateres det, at en virksomhed har afgivet urigtig selvangivelse, således at virksomheden har betalt for lidt i afgift, afkræver Toll- og Skattstova Føroya virksomheden det skyldige beløb til betaling senest 14 dage efter påkrav.

Stk. 2. Kan størrelsen af den afgift, som virksomheden skal betale, ikke opgøres på grundlag af virksomhedens regnskaber, eller fordi selvangivelsen ikke er indleveret, kan Toll- og Skattstova Føroya foretage en skønsmæssig ansættelse af afgiftsgrundlaget.

Stk. 3. Der skal betales et gebyr på 50 kr. for erindringsskrivelser vedrørende betaling af afgift.

§ 12. For betaling af afgift efter denne lov hæfter den, der som ejer, forpagter eller lignende driver virksomheden for egen regning. Er en udenlandsk virksomhed

einum umboðsmanni her sambært § 3. stk. 3, bera hesin og virkið samábyrgd fyri rindan av avgjaldinum.

§ 13. Avgjald, rentur, gjøld og umsitingarligar sektir eftir hesi lóg kunnu verða eftirgivin, um:

1) skuldarin prógvar, at hann ikki er førur fyri og innan fyri tey næstu árini ongi útlit hevur fyri at kunna lúka sínar gjaldsskyldur, og
2) viðurskiftini hjá skuldaranum og umstøðurnar annars tala fyri hesum.

2. stk. Í sambandi við nýtslu av stk.1, nr.2, skal serliga leggjast dentur á, um skuldarin bert ella fyri meginpartin hevur skuld til landskassan, áhugan hjá skuldaranum í eftirgevan, hvussu gomul skuldin er, umstøðurnar við henni tá ið hon varð til og higartil rindan, umframt skuldarans viðurskifti í sambandi við málið um eftirgevingina.

3.stk. Eftirgeving kann bert veitast skuldarum, sum eru likamligir persónar, sbr. tó stk. 7.

4.stk. Eftirgeving kann ganga út uppá eftirgeving ella lækking av skuld skuldarans. Í sambandi við lækking, kann avtala gerast um gjaldsskáa við og rindan í avdráttum av tí ikki eftirgivna partinum av skuldini. Í gjaldsskáa- og avdráttartiðarskeiðnum, verður skuldin ikki forrentað.

5. stk. Eftirgeving kann aftur burtur, um:

1) skuldarin í sambandi við málið um eftirgeving hevur gjørt seg sekan í svikaligum viðurskiftum ella
2) skuldarin grovliga skúgvar til viks sínar skyldur í sambandi við at greiða tann ikki eftirgivna partin av skuldini.

6.stk. Kann skuldarin ikki prógva, at hann ikki er førur fyri og innanfyri tey næstu árini ongi útlit hevur fyri at kunna lúka sínar gjaldsskyldur, sbr. stk.1,nr.1, kann honum í staðin fyri eftirgeving verða latin gjaldskái.

registreret ved en herværende repræsentant efter § 3, stk. 3, hæfter denne og virksomheden solidarisk for betaling af afgiften.

§ 13. Afgift, renter, gebyrer og administrative bøder efter denne lov kan eftergives, såfremt:

1) skyldneren godtgør, at denne ikke er i stand til og inden for de nærmeste år ingen udsigt har til at kunne opfylde sine gældsforpligtelser, og
2) skyldnerens forhold og omstændighederne iøvrigt taler derfor.

Stk. 2. Ved anvendelsen af stk. 1, nr. 2, skal der navnlig lægges vægt på, om skyldneren udelukkende eller overvejende har gæld til landskassen, skyldnerens interesse i eftergivelse, gældens alder, omstændighederne ved dens pådragelse og hidtidige afvikling samt skyldnerens forhold under eftergivelsessagen.

Stk. 3. Eftergivelse kan kun meddeles skyldnere, som er fysiske personer, jf. dog stk. 7.

Stk. 4. Eftergivelse kan gå ud på bortfald eller nedsættelse af skyldnerens gæld. I forbindelse med nedsættelse kan der træffes bestemmelse om henstand med og afdragsvis betaling af den ikke eftergivne del af gælden. I henstands- og afdragsperioden sker der ingen forrentning af gælden.

Stk. 5. Eftergivelse kan bortfalde, såfremt:

1) skyldneren i forbindelse med eftergivelsessagen har gjort sig skyldig i svigagtigt forhold eller
2) skyldneren groft tilsidesætter sine forpligtelser i forbindelse med afvikling af den ikke eftergivne del af gælden.

Stk. 6. Såfremt skyldneren ikke kan godtgøre, at denne ikke er i stand til og inden for de nærmeste år ingen udsigt har til at kunne opfylde sine gældsforpligtelser, jf. stk. 1, nr. 1, kan der i stedet for eftergivelse meddeles skyldneren henstand.

7. stk. Eftirgeving ella gjaldsskái kann annars, tá ið viðurskiftini í heilt serligum førum tala fyri hesum, latast feløgum.

IV Eftirlitsreglur

§ 14. Toll- og Skattstova Føroya hevur, um tað verður mett neyðugt, til eina og hvørja tíð móti hóskandi lógmæti uttan rættarúrskurð atgongd til at gera kanningar í hølum, sum verða brúkt av virkjunum, og til at kanna roknskapartilfar v.m. hjá virkjunum.
2.stk. Handhavi hjá virkjunum og starvsfólk skulu vera Toll- og Skattstovu Føroya til hjálpar í sambandi við kanningar nevndar í stk. 1.
3.stk. Tilfarið nevnt í stk. 1, skal eftir umbøn útflýggjast ella innsendast Toll- og Skattstovu Føroya.
4. stk. Til umsitingina av hesi lóg verður heimilað Toll- og Skattstovu Føroya at nýta persóntalið.

§ 15. Løgreglan veitir Toll- og Skattstovu Føroya hjálp sambært reglum, ið verða ásettar eftir samráðing millum landsstýrið og landsfútan.
2.stk. Skattamyndugleikarnir á staðnum skulu geva Toll-og Skattstovu Føroya upplýsingar um viðurskifti av týdningi fyri eftirlitið við uppkrevjan av avgjaldi, sum teir við skattligum eftirliti fáa kunnleika um.
3.stk. Landsstýrið kann áleggja skattamyndugleikunum á staðnum í sambandi við skattligar kanningar at útvega upplýsingar av týdningi fyri eftirlitið við uppkravdum avgjaldsupphæddum. Virkini skulu eftir umbøn láta skattamyndugleikunum sovorðnar upplýsingar.

Stk. 7. Eftergivelse eller henstand kan i øvrigt, når forholdene i ganske særlig grad taler derfor, meddeles selskaber.

IV Kontrolbestemmelser

§ 14. Toll- og Skattstova Føroya har, hvis det skønnes nødvendigt, til enhver tid mod behørig legitimation uden retskendelse adgang til at foretage eftersyn i lokaler, der benyttes af virksomhederne, og til at efterse virksomhedernes regnskabsmateriale m.v.
Stk. 2. Virksomhedernes indehavere og ansatte skal være Toll- og Skattstova Føroya behjælpelig ved eftersyn nævnt i stk. 1.
Stk. 3. Materialet nævnt i stk. 1 skal efter anmodning udleveres eller indsendes til Toll- og Skattstova Føroya.
Stk. 4. Til administration af denne lov bliver Toll- og Skattstova Føroya bemyndiget til at bruge personnummeret.

§ 15. Politiet yder Toll- og Skattstova Føroya bistand efter regler, der fastsættes efter forhandling mellem landsstyret og landfogeden på Færøerne.
Stk. 2. De kommunale skattemyndigheder skal give Toll- og Skattstova Føroya oplysning om forhold af betydning for kontrollen med opkrævning af afgift, som de under den skattemæssige kontrol bliver opmærksom på.
Stk. 3. Landsstyret kan pålægge de lokale skattemyndigheder i forbindelse med den skattemæssige kontrol at indhente oplysninger af betydning for kontrollen med opkrævede afgiftsbeløb. Virksomhederne skal efter anmodning give skattemyndighederne sådanne oplysninger.

V Klagureglur

§ 16. Landsstýrið kann áseta reglur um møguleikan at klaga um avgerðir eftir hesi lóg.

§ 17. Tann nevnd, sum er sett eftir § 35 í løgtingslóg um meirvirðisgjald, hevur endaligu fyrisitingarligu avgerðina um:

1) Spurningar um avgjaldsskyldu.
2) Spurningar um avgjaldsgrundarlagið.
3) Klagur um áseting sambært meting eftir § 11, stk.2. Umbøn um at leggja mál fyri nevndina, skal verða sett fram í seinasta lagi 4 vikur aftaná, at virki er gjørt kunnugt við avgerðina.

V Klagebestemmelser

§ 16. Landsstyret kan fastsætte regler om adgang til at klage over afgørelser efter denne lov.

§ 17. Det nævn, der er nedsat efter merværdiafgiftslovens § 35, har den endelige administrative afgørelse af:

1) Spørgsmål om afgiftspligt.
2) Spørgsmål om afgiftsgrundlaget.
3) Klager over skønsmæssige ansættelser efter § 11, stk. 2. Anmodning om indbringelse for nævnet skal være fremsat senest 4 uger efter, at virksomheden er gjort bekendt med ansættelsen.

VI Revsireglur

§ 18. Við sekt verður tann revsaður, ið við vilja ella av grovum ósketni:

1) Gevur skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella ikki gevur upplýsingar, at nýta í sambandi við eftirlitið við uppkravdum avgjaldi ella eftirlitið við afturgjalding.
2) Brýtur § 14 stk. 2 ella 3, § a5, stk. 3, 2. pkt.

2.stk. Í fyriskipanum sambært hesi lóg, kann sekt áleggjast tí, sum við vilja ella av grovum ósketni brýtur reglurnar í fyriskipanunum.

3.stk. Tann, sum fremur eitt av nevndu brotum við vilja við tí í hyggju at sleppa undan at rinda avgjald til landskassan, verður sektaður, fær hefti ella fongsul í upp til 2 ár.

4.stk. Fyri lógarbrot, sum verða framd av partafeløgum, smápartafeløgum ella tílíkum, kann sektarábyrgd verða áløgd felagnum sum slíkum.

§ 19. Verður eitt lógarbrot ikki mett at føra til strangari revsing enn sekt, kann

VI Straffebestemmelser

§ 18. Med bøde straffes den, der forsætligt eller groft uagtsomt:

1) Afgiver urigtige eller vildledende oplysninger eller fortier oplysninger til brug for kontrollen med opkrævet afgift eller kontrollen med tilbagebetaling.
2) Overtræder § 14 stk. 2 ella 3, § 15 stk. 3, pkt. 2

Stk. 2. I forskrifter, der udstedes i medfør af loven, kan der fastsættes straf af bøde for den, der forsætligt eller groft uagtsomt overtræder bestemmelser i forskrifterne.

Stk. 3. Den, der begår en af de nævnte overtrædelser med forsæt til at unddrage landskassen afgift, straffes med bøde, hæfte eller fængsel indtil 2 år.

Stk. 4. For overtrædelser, der begås af et aktieselskab, anpartsselskab eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar.

§ 19. Skønnes en overtrædelse ikke at ville medføre højere straf end bøde, kan Toll-

Toll- og Skattstova Føroya boða viðkomandi frá, at málið kann verða avgjørt uttan rættarviðgerð, um so er, at viðkomandi viðgongur seg sekan í lógarbrotinum og vátar, at hann innan eina nærri ásetta freist, sum eftir áheitan kann verða longd, vil gjalda eina í fráboðanini tilskilaða sekt.

2.stk. Viðvíkjandi fráboðanini umrødd í stk. 1, verða reglurnar í rættargangslógini um innihald í ákæruriti í løgreglusakum í nýtslu samsvarandi.

3.stk. Verður sektin goldin rættstundis, ella verður hon sambært góðkenning innheintað ella avsitin, fellur viðari rættarsókn burtur.

4.stk. Tá ið mál um lógarbrot nevnd í § 18 verða løgd fyri rættin, verða tey viðgjørd sum løgreglumál. Rættarráðini í rættargangslógini kapitul 72 og 73 kunnu nýtast í sama mun sum í statsadvokatmálum.

og Skattstova Føroya tilkendegive den pågældende, at sagen kan afgøres uden retslig forfølgning, såfremt den pågældende erkender sig skyldig i overtrædelsen og erklærer sig rede til inden for en nærmere angivet frist, der efter anmodning kan forlænges, at betale en i tilkendegivelsen angivet bøde.

Stk. 2. Med hensyn til tilkendegivelsen nævnt i stk. 1 finder bestemmelserne i retsplejeloven om indhold af anklageskrift i politisager tilsvarende anvendelse.

Stk. 3. Betales bøden i rette tid, eller bliver den efter vedtagelsen inddrevet eller afsonet, bortfalder videre forfølgning.

Stk. 4. Når sager om overtrædelser nævnt i § 18 indbringes for domstolene, behandles de som politisager. Retsmidlerne i retsplejelovens kapitler 72 og 73 kan anvendes i samme omfang som i statsadvokatsager.

VII Gildiskomureglur v.m.

§ 20. Landsstýrið kann áseta nærri reglur fyri framjing av lógini, herímillum roknskaparreglur, og skipa fyri eftirlitsfyriskipanum.

VII Ikrafttrædelsesbestemmelser m.v.

§ 20. Landsstyret kan fastsætte nærmere regler til gennemførelse af loven, herunder regnskabsbestemmelser, og foreskrive kontrolforanstaltninger.

§ 21. Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1994 og er galdandi fyri útgoldna A-inntøku og veitt naturalia frá hesum degi og yvirskot av sjálvstøðugum vinnuvirki ið hava roknskaparskeið ið enda í ella falla saman við 1994.

§ 21. Loven træder i kraft den 1. januar 1994 og er gældende for udbetalt A-indkomst og ydet naturalia fra denne dag og overskud af selvstændig virksomhed som har regnskabsperiode som ender eller falder sammen med 1994.

Viðmerkingar:

Lønhæddargjaldið er eitt gjald, ið verður álagt a-inntøkuni hjá einum parti av tí virksemi, ið ikki er skyldugt at gjalda meirvirðisgjald. Gjaldið líkist sostatt danska "lønsums"avgjaldinum.

Landsstýrið hevur kannað donsku lóggávuna á hesum øki, men er komið eftir, at danska lóggávan verður óneyðuga stór og tung at umsita í Føroyum.

Landsstýrið heldur tí, at betur er at seta í gildi eitt avgjald, ið gevur umleið sama úrslit, men verður munandi einfaldari enn danska "lønsums"avgjaldið at umsita.

Avgjaldsskyldan fevnir um niðanfyristandandi virksemi, ið annars er fritikið fyri at gjalda meirvirðisgjald:

a. læknavirksemi, tannlækna og annað dentalvirksemi, kiropraktik, fysioterapi og onnur verulig heilsurøkt.

b. tryggingarvirksemi

c. banka, sparikassa og annað fíggjarvirksemi.

Avgjaldsgrundarlagið er útgoldna A-inntøkan í avgjaldstíðarskeiðnum. Har talan er um persónliga rikið vinnuvirki er grundarlagið útgoldin A-inntøka + avlop av vinnutvirki gjørt upp eftir reglunum fyri uppgerð av skattskyldugari inntøku.

Har omanfyristandandi upphæddir eru mettar av toll- og skattstovuni, verða hesar mettu upphæddir nýttar sum avgjaldsgrundarlag.

Tryggingarvirksemi, banka, sparikassa og annað fíggjarvirksemi skal gjalda 5 % árliga, meðan annað virksemi skal gjalda 2,5% árliga.

Mett verður, at lønhæddargjaldið gevur landskassanum eina árliga inntøku uppá umleið 12 mió. kr.

Viðmerkingar til tey einkultu punktini:

kap. 1
Lógin fyriskrivar eina avgjaldsskyldu á ein part av ti virksemi, ið er undantikið meirvirðisgjaldsreglunum, og fevnir avsgjaldsskyldan sambært grein 1:

a) læknavirksemi, tannlækna og annað dentalvirksemi, kiropraktik fysioterapi og aðra veruliga heilsurøkt
b) tryggingarvirksemi
c) bankavirksemi og annað fíggjarvirksemi

tó ikki ávísar almennar fíggingarstovnar so sum í § 1 stk. 2 ásett.

Tey virki, ið verða fevnd av avgjaldsskylduni, verða øll skrásett hjá Toll- og Skattstovuni. Fyri verandi virki ger Toll- og Skattstovan skráseting í mun til teir longu fyriliggjandi upplýsingar, ið stovnurin hevur: og fyri virki, ið byrja avgjaldsskyldugt virksemi, eftir lógin kemur í gildi, fyriskrivar lógin eina fráboðanarskyldu áðrenn virksemi byrjar.

kap.2
Avgjaldssatsurin verður í tveimum stigum. Avgjaldið fyri virki so sum læknavirksemi og aðra heilsurøkt er 2,5 % av avgjaldsgrundarlagnum, meðan avgjaldið fyri banka- og tryggingarvirksemi verður 5 % av avgjaldsgrundarlagnum.

Avgjaldsgrundarlagið til útrokning av lønhæddaravgjaldinum er tann av virkinum útgoldna A-lønarupphæddin, t.v.s ein og hvør inntøka, ið starvsfólk hava vunnið í avgjaldstíðarskeiðnum, sum m.a. árs-, mánaðar-, viku-, dags ella tímaløn, gratialer, honorar, bonus, eftirlønargjøld og onnur sløg av samsýning. Um talan er um sjálvstøðug vinnurekandi verður avlop av vinnuvirkinum talt uppí avgjaldsgrundarlagið og skal avlopið tá verða gjørt upp samsvarandi við skattligu uppgerðarreglurnar. Skattliga avlopið verður tá eisini nýtt sum endaliga útrokningargrundalagið fyri avgjaldinum. Um arbeiðsgevarin hevur latið starvsfólki naturalia m.a frían ágóðar, so sum frían bil, so er hendan veiting eisini at meta sum upphædd, ið skal íroknast avgjaldsgrundarlagið. Vavið av lønarhæddini verður sett í mun til hvørjar veitingar bera rætt til frítíð við løn, og tá løgtingslóg nr.30 frá 7.apríl 1986 fyriskrivar, at við útrokning av frítíðarløn og frítíðariskoyti teljast allar skattskyldugar lønarveitingar verða allir frír ágóðar, ið kunnu setast í skattligt virði ítaldir lønarhæddina. Hetta verður gjørt við teimi virðum, ið ásett eru av Líkningarráð Føroya at nýta í sambandi við skattseting.

Kap.3
Goldið verður lønarhæddaravgjald eina ferð um ársfjórðingin. Hetta verður gjørt við at Toll- og Skattstovan skrivar út rokning fyri lønarhæddaravgjaldið við grundarlagi í teimi upplýsingum stovnurin tá hevur um agjaldsgrundarlagið t.v.s. hvussu nógv A- inntøka er farin um kelduskattaskipanina frá virkinum í avgjaldstíðarskeiðnum og um atlit skal vera tikið til møguliga B- inntøku, m.a. av sjálvstøðugum vinnuvirki so verður 1/4 av fyrbilsskrásettu B-inntøkuni eisini íroknað avgjaldsgrundalagið.

Tá virki rindar kvartalskrøvini verður hetta at meta sum á- konto gjald fyri alt árið, ti endalig umrokning verður gjørd, tá árið er liðið og árligu upplýsingar eru til taks, deils í roknskapum og sjálvuppgávum virkisins og eisini í teimi upplýsingum um frían ágóðar, ið arbeiðsgevari sambært skattalógini hevur lógarásetta skyldu at fráboða um.

Toll- og Skattstovan skrivar út fyribilskrov uppá avgjøld eftir hesi lóg, og verða tey at gjalda í síðsta lagi 1 mánað og 10 dagar aftan á endan av hvørjum avgjaldstíðarskeiði/ársfjórðingi.

Um ikki verður goldið rættstundis, kann Toll- og Skattstovan áleggja revsirentu uppá 1,5 % mánaðarliga.

Um virki ikki letur teir neyðugu upplýsingar til útrokning av endaliga avgjaldstilsvarinum, verður, um talan er um ov seint innsendar upplýsingar, avgjaldið hækkað eftir reglunum í grein 7 og um upplýsingarnar als ikki koma inn, er møguleiki at áseta endaliga avgjaldstilsvari í mun til eitt mett avgjaldsgrundarlag.

Kap.4
Toll- og Skattstovan fær tær neyðugu eftirlitsheimildirnar í sambandi við umsiting av lógini, og eru hesar heimildir líkar teimum, ið stovnurin frammanundan hevur í sambandi við skatta- og meivirðisgjaldseftirlit.

Kap. 5.
Sokallaða MVG- nevndin verður fyristingarligur kærumyndugleiki fyri teim avgerðum, ið Toll- og Skattstovan kemur at taka sambært hesi lóg. Nevndin kemur at hava endaliga fyrisitingarliga avgerðarræu tá mál viðvíkja avgjaldsskylduni og avgjaldsgrundarlagnum. Eisini kunnu tær metingar kærast, ið Toll- og Skattstovan nevur heimild at gera, um ikki neyðugu upplýsingarnar fyriliggja til ásetingar av avgjaldsgrundarlagnum.

Kap.6
Revsireglunar fyriskriva sum meginreglu sekt fyri brot framd á hesa lóg, sum m.a. kann standast av at virki við vilja ella av grovum ósketni letur rangar ella villleiðandi upplýsingar til nýtslu fyri útrokningargrundarlagnum. Samstundis verður heimild givin til, at sekt eftir hesi lóg kann avgreiðast sum fyrisitingarligt sektarmál, um so er, at fyrisitingarmyndugleikin kann fáa semju um eina sektarupphædd, og játtan um lógarbrotið.

Lógin er ætlað at koma í gildi 1. januar 1994.

1. viðgerð 27. oktober 1993. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. november 1993 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 21. oktober 1993 og eftir 1. viðgerð 27. oktober 1993 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við P/F Føroya Banka, P/F Sjóvinnubankan, Tryggingarsambandið Føroyar, Læknafelag Føroya og Føroya Tannlæknafelag, ið kunnaði nevndina um, hvørja ávirkan hetta uppskot fekk á virksemi teirra.

Eisini hevur nevndin havt fund við Finnboga Isakson, landsstýrismann.

Gildisreglurnar fyri skattgjaldarar við brotnum roknskaparskeiði mugu nágreinast, og tí verður neyðugt at gera broyting í § 21.

Undir viðgerðini er gjaldstovan komin við ynski um broytingar til innkrevjingarreglurnar í § 7.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og 2 minnilutar.

Meirilutin (Lasse Klein, Heini O. Heinesen og Eyðálvur Dimon) mælir til at samtykkja uppskot landsstyrisins við hesum broytingum og setir tí fram soljóðandi

broytingaruppskot

1) § 5, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Avgjaldsgrundarlagið er fyri tey í § 1, stk. 1, nr. 1 nevndu virkir útgoldin A-lønarupphædd hjá virkinum við avlopi av sjálvstøðugum vinnuvirki afturatløgdum ella undirskoti frádrignum, gjørt upp eftir reglunum fyri uppgerð av skattskyldugari inntøku".

2) Í § 6, stk. 5 verður orðið "gjaldsmánaðinum" broytt til "forfalsmánaðinum".

3) Í § 7, stk. 1, pkt. 3 verður orðingin "Innkrevjing av" strikað.

4) Í § 7 verður sum stk. 7 sett:
"Lønhæddaravgjald, ið ikki er goldið rættstundis, kann saman við rentum verða innheintað av Føroya Gjaldstovu við panting eftir reglunum fyri innkrevjing av skattum og avgjøldum".

5) Í § 7 verður sum stk. 8 sett:
"lønhæddargjald, ið ikki er goldið rættstundis, kann saman við rentum verða innheintað við eftirhaldi í A-inntøkuni hjá viðkomandi eftir reglunum í skattalógini um innheinting av skatti".

6) § 21 verður orðað soleiðis:
"stk. 1. Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1994 og er galdandi fyri útgoldna A-inntøku, veitt naturalia og yvirskot av sjálvstøðugum vinnuvirki frá hesum degi.
Stk. 2. Fyri virkir, fevnd av avgjaldsskylduni í § 1 og sum ikki nýta álmanakkaárið sum uppgerðartíðarskeið, er fyrsta uppgerðartíðarskeið hjá virkinum frá 1. januar 1994 til endan av inntøkuárinum. Viðvíkjandi yvirskoti ella undirskoti hjá virkinum, so sum nevnt í § 5, verður avgjalds-

1) § 5, stk. 1 affattes således:
"Afgiftsgundlaget for de i § 1, stk. 1, nr. 1 nævnte virksomheder er virksomhedens lønsum med tillæg af overskud eller fradrag af underskud af selvstændig virksomhed, opgjort efter reglerne om opgørelse af den skattepligtige indkomst".

2) Uændret.

3) I § 7, stk. 1, pkt. 3 udgår "Opkrævning af".

4) I § 7 indsættes som stk. 7:
"lønsumafgift, som ikke er betalt rettidigt, kan med tillæg af renter inddrives af Føroya Gjaldstova ved udpantning efter reglerne om inddrivelse af skatter og afgifter".

5) I § 7 indsættes som stk. 8:
"lønsumafgift, som ikke er betalt rettidigt, kan med tillæg af renter inddrives ved indeholdelse i den pågældendes A-indkomst efter skattelovens regler or inddrivelse af skatter".

6) § 21 affattes således:
"stk. 1. Loven træder i kraft den 1. januar 1994 og er gældende for udbetalt A-indkomst, ydet naturalia, og overskud af selvstændig virksomhed fra denne dato.
Stk. 2. For virksomheder, omfattet af afgiftspligten i § 1, der ikke anvender kalenderåret som opgørelsesperiode, er virksomhedens første opgørelsesperiode fra 1. janur 1994 til indkomstårets udløb. For så vidt angår virksomhedens overskud eller underskud

grundarlagið fyri hetta uppgerðartíðarskeið roknað lutfalsliga svarandi til lutfallið millum longdina á hesum tíðarskeiði og inntøkuárinum hjá virkinum".

som anført i § 5 beregnes afgiftsgrundlaget for denne opgørelsesperiode forholdsmæssigt svarende til forholdet mellem længden af denne periode og virksomhedens indkomstår".

Minnilutin (Jógvan Sundstein) tekur ikki undir við uppskotinum og vísir til álitið í tingmáli nr. 19/1993.

Minnilutin (Finnbogi Arge) førir hetta fram:

Læknavirksemi, tryggingarvirksemi og banka- og sparikassavirksemi vóru undantikin meirvirðisgjaldsskipanini.

Í royndunum at skatta alt, sum yvirhøvur kann skattast, tekur landsstýrið nú nýggjan skattingarhátt í nýtslu. Hesin skattingarháttur verður tikin í nýtslu har, sum meirvirðisgjaldsskipanin ikki røkkur.

Læknavirksemi, tannlækna- og annað dentalvirksemi, kiropraktik, fysioterapi og onnur heilsurøkt skal nú eykaskattast við 2,5% av útgoldnu lønarupphæddini og av møguligum avlopi.

Tryggingarvirksemi og banka- og sparikassavirksemi skal nú eykaskattast á sama hátt við 5%. Fyri sparikassar kemur byrðan oman á ein 22% skatt, sum kemur í gildi komandi ár.

Sparikassarnir hava longu víst á, at eyka skattabyrðan fer at gera tað neyðugt at hækka rentumarginalin og at úrslitið tí verður, at útlánsrentan kemur at hækka.

Landsstýrið metir, at uppskotið fer at geva landskassanum eina árliga innтøku upp á 12 mió.kr.

Men tað verða hvørki læknar, tannlæknar, Tryggingarsambandið, sparikassarnir ella bankarnir, sum koma at gjalda hesar 12 mió. til landskassan.

Rokningin verður send víðari til borgaran, og tað verður borgarin, sum hevur skuld, sum kemur at rinda hægri útlánsrentu.

Minnilutin (Finnbogi Arge) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum frá at samtykkja lógina.

2. viðgerð 16. november 1993. Uppskotið broytt eftir tilmæli frá skattanevndini samtykt við 17-8 atkvøðum.

3. viðgerð 2. desember 1993. Uppskotið endaliga samtykt við 17-8 atkvøðum.

Lóg nr. 193 frá 10. desember 1993.

34 Broytingar viðvíkjandi vali av nevndum í ymsum lógum

Ár 1993, hósdagin 28. oktober legði Thomas Arabo, landsstýrismaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broytingar viðvíkjandi vali av nevndum í ymsum lógum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 59 frá 9. juni 1988 um landsjørð, sum broytt við løgtingslóg nr. 66 frá 12. juni 1990 og løgtingslóg nr. 49 frá 8. mai 1991 verður § 3 orðað soleiðis:
"**§ 3.** 5 limir og 5 tiltakslimir eru í Jarðarráðnum. Løgtingið velur 4 limir og 4 tiltakslimir. Landsstýrið velur 1 lim, sum er formaður, og ein tiltakslim. Limir og tiltakslimir verða valdir, tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

§ 2.

Í løgtingslóg nr. 97 frá 1. november 1978 um húsalánsgrunn við seinni broytingum verður § 3 orðað soleiðis:
"**§ 3.** Grunnurin verður fyrisitin av stýri við 3 limum. Løgtingið velur 2 og landsstýrið velur 1. Tiltakslimir verða valdir á sama hátt. Limir og tiltakslimir verða valdir, tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði. Stýrið skipar seg sjálvt við formanni."

§ 3.

Í lóg nr. 84 frá 31. mars 1926 fyri Føroyar "om landvæsenskommissioner" verða orðini í § 1, stk. 1 "De vælges for 6 år ad gangen" strikað, og í staðin verður sett:

lagtingslov om ændringer vedrørende valg af bestyrelser i forskellige love.

§ 1.

I lagtingslov nr. 59 af 9. juni 1988 om landsjord, som ændret ved lagtingslov nr. 66 af 12. juni 1990 og lagtingslov nr. 49 af 8. maj 1991 affattes § 3 således:
"**§ 3.** Landbrugsrådet har 5 medlemmer og 5 suppleanter. Lagtinget vælger 4 medlemmer og 4 suppleanter. Landsstyret vælger 1 medlem, som er formand, og 1 suppleant. Medlemmerne og suppleanterne vælges, når der er dannet landsstyre efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."

§ 2.

I lagtingslov nr. 97 af 1. november 1978 om boliglånefond med senere ændringer affattes § 3 således:
"**§ 3.** Fonden administreres af en bestyrelse på 3 medlemmer. Lagtinget vælger 2 og landsstyret vælger 1 medlem. Suppleanter vælges på samme måde. Medlemmer og suppleanter vælges, når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode. Bestyrelsen konstituerer sig selv med formand."

§ 3.

I lov nr. 84 af 31. marts for Færøerne om landvæsenskommissioner udgår i § 1, stk. 1 ordene "De vælges for 6 år ad gangen" og i stedet indsættes:
"Medlemmerne vælges, når nyt landsstyre

"Limirnir verða valdir, tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

§ 4.

Í løgtingslóg nr. 57 frá 2. oktober 1978 um Landsbanka Føroya verða hesar broytingar gjørdar:

1) Í § 4, stk. 2, verður litra d orðað soleiðis:
"Limirnir í umsjónarráðnum verða valdir, tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði. Fer limur frá, áðrenn valskeiðið er runnið, verður nýggjur limur valdur fyri restina av skeiðinum. Umsjónarráðið skipar seg sjálvt við formanni og næstformanni fyri 1 ár í senn, tó altíð tá eitt nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."
2) Í § 4, stk. 3, litra c verður skoytt uppí í endanum: "tó altíð tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

§ 5.

Í løgtingslóg nr. 58 frá 2. oktober 1978 um skúlafyrisiting verður sum nýtt 5. pkt. í § 2, stk. 1 sett:
"Limir og tiltakslimir verða valdir, tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

§ 6.

Í løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Føroya løgting við seinni broytingum verður § 12 orðað soleiðis:
"§ 12. Løgtingið velur eina valnevnd fyri hvørt valdømi við 3 limum og 3 tiltakslimum. Limir og tiltakslimir verða

er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."

§ 4.

I lagtingslov nr. 57 af 2. oktober 1978 om Landsbanki Føroya foretages følgende ændringer:

1) I § 4. stk. 2 affattes litra d, således:
"Medlemmerne af tilsynsrådet vælges når der er dannet nyt landsstyre efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode. Udtræder et medlem inden valgperiodens udløb, vælges et nyt medlem for resten af perioden. Tilsynsrådet konstituerer sig selv med formand og næstformand for et år ad gangen, dog altid når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."
2) I § 4, stk. 3, litra c tilføjes i slutningen: "dog altid når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."

§ 5.

I lagtingslov nr. 58 af 2. oktober 1978 om styrelsen af undervisningsvæsenet indsættes som nyt 5. pkt. i § 2, stk. 1:
"Medlemmer og suppleanter vælges, når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."

§ 6.

I lagtingslov nr. 49 af 20. juli 1978 om valg til Færøernes lagting med senere ændringer affattes § 12 således:
"§ 12. For hver opstillingskreds vælger lagtinget et valgnævn med 3 medlemmer og 3 suppleanter. Medlemmer og supple-

valdir, tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði. Formansstarvið í nevndini verður eftir raðfylgjuni, limirnir eru valdir í. Limirnir hava skyldu at taka við starvinum, uttan so, at teir hava fylt 60 ár ella eftir løgtingsins meting hava lógligt forfall."

§ 7.

Í løgtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973 um menningargrunn fyri íðnað, handverk og tænastufyritøkur við seinni broytingum verður § 3 orðað soleiðis:

"§ 3. 5 limir og 5 tiltakslimir eru í nevnd grunsins. Løgtingið velur 4 limir og 4 tiltakslimir. Landsstýrið velur 1 lim, sum er formaður, og 1 tiltakslim. Limir og tiltakslimir verða valdir, tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

§ 8.

Í løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um natúrfriðing verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 10 verður orðað soleiðis:
"§ 10. Í hvørjari sýslu verður friðingarnevnd sett við sýslumanninum sum formanni og 2 øðrum limum. Eisini velur løgtingið 2 tiltakslimir, og verða limir og tiltakslimir valdir, tá nýtt landsstýri er skipað, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."
2) Í § 11 verða í tveimum støðum orðini "fyri 6 ár í senn" strikað.
3) Í § 11 verður í endanum skoyt uppí:
"Limir og tiltakslimir verða valdir, tá nýtt landsstýri er skipað, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

anter vælges, når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode. Valgnævnets formandspost indtages af medlemmerne i den orden, hvori de er valgt. Ethvert medlem af valgnævnet er pligtigt til at påtage sig hvervet, medmindre vedkommende er fyldt 60 år, eller efter lagtingets skøn har lovligt forfald."

§ 7.

I lagtingslov nr. 37 af 26. juni 1973 om udviklingsfond for industri, håndværk og servicevirksomheder med senere ændringer affattes § 3 således:

"§ 3. Fondens bestyrelse har 5 medlemmer og 5 suppleanter. Lagtinget vælger 4 medlemmer og 4 suppleanter. Landsstyret vælger 1 medlem, som er formand, og 1 suppleant. Medlemmerne og suppleanterne vælges, når der er dannet landsstyre efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."

§ 8.

I lagtingslov nr. 48 af 9. juli 1970 om naturfredning foretages følgende ændringer:

1) § 10 affattes således:
"§ 10. I hvert syssel oprettes et fredningsnævn bestående af sysselmanden som formand og 2 andre medlemmer. Lagtinget vælger også 2 suppleanter og vælges medlemmer og suppleanter når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."
2) I § 11 udgår to steder ordene "for 6 år ad gangen".
3) I slutningen af § 11 tilføjes:
"Medlemmer og suppleanter vælges når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."

§ 9.

Í løgtingslóg nr. 11 frá 14. februar 1957 um útvarpsnevnd við seinni broyting verða í § 1 strikað orðini "Hesir verða valdir av løgtinginum á hvørjum fyrsta tingi eftir løgtingsval." og í staðin verður sett: "Limirnir verða valdir, tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

§ 10.

Í løgtingslóg nr. 53 frá 27. november 1952 um viðarlundir, sum broytt við løgtingslóg nr. 58 frá 22. august 1975 verður skoytt uppí § 2, stk. 2:

"Limirnir verða valdir tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

§ 11.

Í løgtingslóg nr. 24 frá 28. mars 1956 um trygging verða stk. 2, stk. 3 og stk. 4 í § 6 orðað soleiðis:

"**Stk. 2.** Í umboðsráðnum sita 7 limir, sum løgtingið velur tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði.

Stk. 3. Í nevndini eru 5 limir. Av teimum velur umboðsráðið 1, løgtingið 2 og landsstýrið 2. Limirnir verða valdir tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði. Í undirdeildunum, har nevndin ikki er tann sama, sum nevndin fyri Tryggingarsambandið Føroyar, verða limir og tiltakslimir valdir tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði.

Stk. 4. Ta almennu umsjónina við samtakinum hava tveir til tess valdir persónar, ávikavist tilskilaðir av løgtingi og av landsstýri. Teir verða valdir, tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsvalg, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri

§ 9.

I lagtingslov nr. 11 af 14. februar 1957 om radioudvalg med senere ændring udgår i § 1 ordene ", der vælges af lagtinget i hver første tingsamling efter lagtingsvalg." og i stedet indsættes:

"Medlemmerne vælges, når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."

§ 10.

I lagtingslov nr. 53 af 27. november 1952 om plantager, som ændret ved lagtingslov nr. 58 af 22. august 1975 tilføjes i § 2, stk. 2:

"Medlemmerne vælges når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."

§ 11.

I lagtingslov nr. 24 af 28. marts 1956 om forsikring affattes stk. 2, stk. 3 og stk. 4 i § 6 således:

"**Stk. 2.** Repræsentantskabet består af 7 medlemmer, der vælges af lagtinget når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode.

Stk. 3. Bestyrelsen består af 5 medlemmer, hvoraf repræsentantskabet vælger 1, lagtinget 2 og landsstyret 2. Medlemmerne vælges når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode. I underafdelinger, der ikke har den samme bestyrelse, som bestyrelsen for Tryggingarsambandið Føroyar, vælges medlemmer og suppleanter, når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode.

Stk. 4. Det offentlige tilsyn med forbundet føres af to henholdsvis af lagtinget og landsstyret udpegede personer. Disse personer vælges når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når

í einum valskeiði. Útreiðslurnar av umsjónini falla á samtakið."

§ 12.

Í løgtingslóg nr. 64 frá 10. oktober 1966 um lívstryggingarvirksemi við seinni broytingum verður skoytt uppí § 4, stk. 2, sum nýtt síðsta pkt.: "Tilsýnið verður valt tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsvalg, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

§ 13.

Í lóg nr. 147 frá 27. mars 1939 "om udskiftning" verða í § 8, stk. 2 orðini "for 6 år ad gangen" strikað, og verður skoytt uppí í endanum á stk. 2:
"Limirnir verða valdir, tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

§ 14.

Í fyriskipan fyri Føroyar nr. 389 frá 15. november 1966 "om forsikring mod følger af ulykkestilfælde" verða í § 9 orðini "for 4 år" strikað, og skoytt verður uppí aftaná síðsta pkt.:
"Limir og tiltakslimir verða valdir tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

§ 15.

Í løgtingslóg nr. 42 frá 23. juni 1978 um príseftirlit verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 3, stk. 1 verða strikað orðini "Landsstýrið velur prísráðið fyri 4 ár", og í staðin verður sett: "Landsstýrið velur prísráðið tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."
2) Stk. 2 í § 15 verður orðað soleiðis:
"**Stk. 2.** Yvirprísráðið hevur 3 limir, sum verða valdir av løgtinginum, tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt

ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode. Udgifterne ved tilsynet afholdes af forbundet."

§ 12.

I lagtingslov nr. 64 af 10. oktober 1966 om livsforsikringsvirksomhed med senere ændringer tilføjes i § 4, stk. 2 som nyt sidste pkt.: "Tilsynet vælges når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."

§ 13.

I lov nr. 147 af 27. marts 1939 om udskiftning udgår i § 8, stk. 2 ordene "for 6 år ad gangen" og der tilføjes i slutningen af stk. 2:
"Medlemmerne vælges når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."

§ 14.

I anordning for Færøerne nr. 389 af 15. november 1966 om forsikring mod følger af ulykkestilfælde udgår i § 9 ordene "for 4 år" og der tilføjes efter sidste punktum:
"Medlemmer og suppleanter vælges, når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner nyt landsstyre i en valgperiode."

§ 15.

I lagtingslov nr. 42 af 23. juni 1978 om priskontrol foretages følgende ændringer:

1) I § 3, stk. 1 udgår ordene "Prisrådet vælges af landsstyret for 4 år", og i stedet indsættes: "Prisrådet vælges af landsstyret når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."
2) Stk. 2 i § 15 affattes således:
"**Stk. 2.** Overprisrådet har 3 medlemmer, der vælges af lagtinget, når nyt landsstyre er dannet efter hvert

løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

§ 16.

Í lóg fyri Føroyar nr. 36 frá 28. februar 1908 "om foranstaltninger mod smitsomme sygdomme hos husdyrene m.m.", sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 15 frá 13. mars 1951, verður skoytt uppí 1. pkt. í § 9 "og verða limir og tiltakslimir valdir, tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsvalg, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

§ 17.

Í løgtingslóg nr. 68 frá 24. september 1970 um "Føroya Ídnaðargrunn" við seinni broytingum verður í § 3, stk. 1 aftaná orðini "Stýrið verður tilnevnt beint eftir, at landsstýrið tekur við aftaná hvørt løgtingsval" sett: "ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

§ 18.

Í løgtingslóg nr. 80 frá 12. juni 1990 um Ferðaráð Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 55 frá 8. mai 1991, verður skoytt uppí § 3, stk. 1 í endanum: "Limirnir verða valdir, tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

§ 19.

Í løgtingslóg nr. 58 frá 24. mai 1974 um arbeiðaravernd við seinni broytingum verður § 38, stk. 2 orðað soleiðis:

"**Stk. 2.** Landsstýrið velur umboðini og sama tal av tiltaksumboðum. Umboð og tiltaksumboð verða vald, tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner nyt landsstyre i en valgperiode."

§ 16.

I lov for Færøerne nr. 36 af 28. februar 1908 om foranstaltninger mod smitsomme sygdomme hos husdyrene m.m., som senest ændret ved lagtingslov nr. 15 af 13. marts 1951 tilføjes 1. pkt. i § 9 "og vælges medlemmer og suppleanter, når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner nyt landsstyre i en valgperiode."

§ 17.

I lagtingslov nr. 68 af 24. september 1970 om "Føroya Ídnaðargrunn" med senere ændringer indsættes i § 3, stk. 1 efter ordene "Bestyrelsen beskikkes umiddelbart efter, at landsstyret er trådt i funktion efter hvert lagtingsvalg": "eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."

§ 18.

I lagtingslov nr. 80 af 12. juni 1990 om Færøernes Turistråd, som ændret ved lagtingslov nr. 55 af 8. maj 1991 tilføjes i slutningen af § 3, stk. 1: "Medlemmerne vælges når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."

§ 19.

I lagtingslov nr. 58 af 24. maj 1974 om arbejderbeskyttelse med senere ændringer affattes § 38, stk. 2 således:

"**Stk. 2.** Landsstyret vælger repræsentanterne og samme antal stedfortrædere. Repræsentanter og stedfortrædere vælges når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."

§ 20.

Í løgtingslóg nr. 94 frá 4. oktober 1984 um tiltøk at minka um tubbaksnýtsluna verður sum nýtt stk. 2 í § 6 sett:
"**Stk. 2.** Limirnir verða valdir, tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

§ 21.

Í løgtingslóg nr. 62 frá 5. juni 1984 um evnisskráir hjá almennum myndugleikum við seinni broytingum, verða í § 23, stk. 1, síðsta pkt. orðini "fyri 4 ár" broytt til "tá nýtt landsstýri er skipað aftan á hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

§ 22.

Í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2, 5. parti, verða orðini "Nevndin situr í 4 ár." strikað, og í staðin verður sett: "Limir og tiltakslimir verða valdir tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."
2) Í § 15 ganga orðini "fyri 6 ár í senn" út, og skoytt verður uppí sum nýtt síðsta pkt.: "Limir og tiltakslimir, ið landsstýrið velur, verða valdir, tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

§ 23.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 92, stk. 2 verða orðini "fyri 4 ár" strikað, og skoytt verður uppí í

§ 20.

I lagtingslov nr. 94 af 4. oktober 1984 om foranstaltninger med henblik på nedsættelse af tobaksforbruget indsættes som nyt stk. 2 i § 6:
"**Stk. 2.** Medlemmerne vælges, når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."

§ 21.

I lagtingslov nr. 62 af 5. juni 1984 om offentlige myndigheders registre med senere ændringer ændres i § 23, stk. 1, sidste pkt. ordene "for 4 år" til: "når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny koalition danner landsstyre i en valgperiode."

§ 22.

I lagtingslov nr. 13 af 21. maj 1954 om byplaner og byggevedtægter med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 2, stk. 5, udgår ordene "Nævnets funktionstid er 4 år." og i stedet indsættes: "Medlemmer og suppleanter vælges når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."
2) I § 15 udgår ordene "for 6 år" og der tilføjes som nyt sidste pkt.: "Medlemmer og suppleanter, der vælges af landsstyret, vælges, når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."

§ 23.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 92, stk. 2 udgår ordene "for 4 år" og der tilføjes i slutningen som nyt 3. pkt.: "Medlemmer og suppleanter

endanum, sum nýtt 3. pkt.: "Limir og tiltakslimir verða valdir tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

2) Í § 96, stk. 2 verður síðsta pkt. strikað og í staðin verður sett: "Limir og tiltakslimir verða valdir, tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

vælges når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."

2) I § 96, stk. 2 udgår sidste pkt. og i stedet indsættes: "Medlemmer og suppleanter vælges, når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."

§ 24.

Í løgtingslóg nr. 46 frá 5. mai 1987 um Menningarstovu verða hesar broytingar gjørdar:

1) § 4, stk. 4, verður orðað soleiðis:
"**Stk. 4.** Menningarráðslimir verða valdir tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

2) § 5, stk. 3, verður orðað soleiðis:
"**Stk. 3.** Stýrislimirnir verða valdir tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

§ 24.

I lagtingslov nr. 46 af 5. maj 1987 om Menningarstova foretages følgende ændringer:

1) § 4, stk. 4. affattes således:
"**Stk. 4.** Rådets medlemmer vælges når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."

2) § 5, stk. 3, affattes således:
"**Stk. 3.** Bestyrelsesmedlemmerne vælges når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."

§ 25.

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald verður í § 35, stk. 1 skoytt uppí sum nýtt 2. pkt.:
"Nevndarlimirnir verða valdir, tá nýtt landsstýri er skipað, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum valskeiði."

§ 25.

I lagtingslov nr. 136 af 8. september 1992 om meromsætningsafgift tilføjes i § 35, stk. 1 som nyt 2. pkt.:
"Medlemmerne i nævnet vælges, når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."

§ 26.

Í løgtingslóg nr. 47 frá 23. mars 1993 um kærunevnd í almannamálum verður síðsta pkt. í § 2, stk. 1 strikað, og í staðin verður sett: "Limir og varalimir verða valdir tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, ella tá nýggj politisk samgonga skipar landsstýri í einum val-

§ 26.

I lagtingslov nr. 47 af 23. mars 1993 om socialt ankenævn udgår sidste pkt. i § 2, stk. 1 og i stedet sættes: "Medlemmer og suppleanter vælges når nyt landsstyre er dannet efter hvert lagtingsvalg, eller når ny politisk koalition danner landsstyre i en valgperiode."

skeldi."

§ 27.

Val sambært hesi lóg fer fyrstu ferð fram beint aftaná, at lógin er komin í gildi.

§ 28.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 27.

Valg i henhold til denne lov finder sted straks efter, at loven er trådt i kraft.

§ 28.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Uppskotið um broytingar í reglunum um nevndarval í ymiskum lógum er gjørt eftir áheitan úr løgtinginum.

Tá nýggj politisk samgonga í aprfl mánaði í ár skipaði landsstýri, kundi nýtt nevndarval í stóran mun ikki fara fram. tí lógarreglur forðaðu fyri hesum.

Tað má metast hóskandi, at nevndirnar hava sama politiska lit, sum politiska samgongan hevur, ið hevur meirilutan í løgtinginum.

Aðrar nevndir eru, enn tær, sum eru nevndar í hesum lógaruppskoti, men hesar verða antin valdar sambært donskum lógum, kunngerðum ella viðtøkum, og skulu broytingar sostatt ikki gerast við løgtingslóg.

Landsstýrið leggur við hesum málið fyri løgtingið.

1. viðgerð 2. november 1993. Málið var beint í rættarnevndina. Burturdottið vegna samgonguslit.

FL jnr. 685-1/93.

35 Loyvi til Húsalánsgrunnin, Menningargrunnin og Ídnaðargrunnin at rentunullstilla útlán og gera neyðsemjur (akkordir)

Ár 1993, mikudagin 27. oktober legði kristiligi fólkaflokkurin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokkur fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um loyvi til Húsalánsgrunnin, Menningargrunnin og Ídnaðargrunnin at rentunullstilla útlán og gera neyðsemjur (akkordir).

§ 1. Húsalánsgrunninum, Menningargrunninum og Ídnaðargrunninum verður heimilað at rentunullstilla útlán og gera neyðsemjur (akkordir) fyri at minka um møgulig tap.

§ 2. Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om tilladelse til Húsalánsgrunnin, Menningargrunnin og Ídnaðargrunnin at rentenulstille udlån og indgå akkorder.

§ 1. Húsalánsgrunnurin, Menningargrunnurin og Ídnaðargrunnurin bemyndiges at rentenulstille udlån og indgå akkorder for at mindske eventuelle tab.

§ 2. Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Støðan hjá sethúsaeigarum og virkjum hevur leingi verið vánalig. Nógvar familjur hava mist húsini, og uppaftur fleiri standa til at missa tey, um einki verður gjørt. Enn røkist einki fyri, at nakað verður gjørt annað enn at bjarga teimum báðum stóru bankunum og landskassanum við donskum ríkisláni.

Eftir at bankaeftirlitið setti virðini á sethúsum til 500.000 kr. í Tórshavn, 350.000 á stórplássum og 2-300.000 á bygd, er stórur vandi fyri, at Húsalánsgrunnurin missir nógvan pening, tí at hann liggur so mikið aftarlaga í prioriteti eftir sparikassan og Húsalán/-Sethúsabankan.

Hetta er ein støða, sum eisini Menningargrunnurin og Ídnaðargrunnurin kenna.

Við at veita grunninum loyvi til at rentunullstilla útlán og gera neyðsemjur (akkordir), har hetta ikki er nóg mikið, kunnu sethúsaeigarar verða verandi í húsum sínum, virkini halda fram og grunnarnir sleppa undan at missa allan pening sín. Við at gera neyðsemjur (akkordir) kunnu grunnarnir í teimum førum, har veðhald teirra liggur uttan fyri marknaðarvirði, avmarka tapini og bjarga peningi, sum annars er mistur við vanligari tvingsilssølu, um einki verður gjørt.

Tað eigur at verða kravt av bankum og sparikassum, at eisini teir rentunullstilla útlán og gera neyðsemjur (akkordir), har fólk eru ikki før fyri at halda skyldur sínar.

Endamálið má verða at bjarga familjunum heimini, peningastovnunum tað, ið møguligt er, og fáa virkini aftur í gongd, sum eru steðgað ella um at steðga, so at arbeiðsloysið ikki veksur meir, men minkar.

1. viðgerð 2. november 1993. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 15. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 27. oktober 1993 og eftir 1. viðgerð 2. november 1993 beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen, Karl Heri Joensen og Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram. Meirilutin vísir á uppskot landsstýrisins í løgtingsmáli nr. 83/93: Broyting í løgtingslóg um húsalánsgrunn og á álit figgjarnevndarinnar í sama máli.

Ein minniluti (Anfinn Kallsberg) vísir á, at fleiri royndir hava verið gjørdar frá fólkaflokkinum at fáa gjørt eina heildarætlan fyri niðurskriving av útláni við tí fyri eyga at fáa tillagað okkara figgjarviðurskifti til tær broyttu fyritreytirnar í landi okkara. Einki av hesum uppskoti hevur vunnið frama.

Fyri at kunna verða við í tillagingini, er neyðugt, at figgingargrunnarnir hava heimild at gera gjaldskipan, rentuavtalur og akkordir.

Hesa heimild tók sitandi samgonga aftur við avtøku av lóg nr. 28 frá 30. apríl 1987. Fólkaflokkurin vísti í hesum sambandi á, at tað var sera óheppið, og kundi ikki taka undir við hesum. Fyriliggjandi uppskot gongur út upp á at fáa grunninum henda møguleika aftur, og tað tekur fólkaflokkurin undir við.

Ein annar minniluti (Tordur J. Niclasen) ásannar, sum hann so mangan hevur gjørt áður, at munagóð tiltøk eiga at verða gjørd til tess at bøta um støðuna hjá sethúsaeigarum og at bøta um fortreytirnar hjá teimum, sum royna seg í vinnuligum virksemi. Hvat húsalánsgrunninum viðvíkir, hevði minnilutin longu í 1989 uppskot á tingi um broytingar í lógini um húsalánsgrunn. Hesar broytingar høvdu til endamáls at heimila húsalánsgrunninum at leingja um afturgjaldstíðina, og at lán, tikin eftir 1. januar 1989, skuldu tey fyrstu 4 árini verða rentu- og avdráttarfrí.

Fyri at bøta um støðu húsalánsgrunsins varð somuleiðis skotið upp at gera broytingar í lógini um "rentustudning til samansparing til húsabygging".

Tí fegnast minnilutin (Tordur J. Niclasen) um, at eisini aðrir royna - og at landsstýrið nú eisini er komið við uppskoti, sum hóast alt opnar møguleikan fyri einum lætta - væl at merkja í eini felagsloysn við aðrar avvarðandi peningastovnar.

Sostatt verður tikið undir við uppskotinum, sum heimilar nevndu grunnum nýggjar møguleikar.

2. viðgerð 22. apríl 1994. Uppskotið fall við 3-0 atkvøðum.

36 Kanning av samanleggingini av Sjóvinnubankanum og Føroya Banka

Ár 1993, mikudagin 27. oktober legði Birgir Danielsen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Við serligum atliti til sambæriligleikan av virðunum av partabrøvum í P/f Sjóvinnubankanum og P/f Føroya Banka, tá partabrævaumbýtið fór fram tann 22. mars í ár, og nú, tá bankarnir verða lagdir saman, verður álagt landsstýriuum at seta í verk eina kanning, sum skal vísa, hvørji virði hava verið aftanfyri partabrøvini í báðum bankunum.

Kanningin skal gerast við serligum atliti til eina sammeting av avsetingunum móti væntaðum tapum uppá skuldarar í báðum bankunum, og harvið eini sammeting av virðunum av skuldarunum.

Úrslitið verður at leggja fyri løgtingið í seinasta lagi 15. dec. í ár.

Viðmerkingar:

Rembingarnar innan føroyska bankaheimin eru higartil endaðar við tapum og nýggjum peningi til Sjóvinnubankan og Føroya Banka soleiðis:

Tap eginogn SB	417 mió.		
Tap eginogn FB	500 "	, herav Den Danske Bank	310 mió.
innskot í FB	138 "	, " " " "	138 "
" " "	200 "	, " " " "	200 "
partap. " SB	285 "		
innskot " SB	190 "		
" " "	350 "		
" " "	560 "		

Tils. tap & innsk. 2.640 mió., herav DDB mist 648 mió.

Eftir at bankarnir báðir 22. mars býttu um partabrøv, solciðis at fíggingargrunnurin, t.v.s. Føroya Landsstýri, kom at eiga meirilutan í báðum bankunum, meðan DDB varð ein 30% minnilutapartaeigari í báðum bankunum frá at hava verið ein stórur meirlutaeigari í FB, er úrslitið nú vorðið tað, at landsstýrið eigur báðar bankarnar við einum samlaðum tapi fyri privatu partaeigararnar upp á 607 mió. og landskassaútleggum upp á 1385 mió. alla tap og útlegg tils. 1.992 mió., meðan DDB hevur mist 648 mió.

Lagt eigur at verða aftrat, at aftur fyri so eiga vit nú báðar bankarnar við øllum skyldum og rættindum framyvir.

Nú er so uppskot á tingi um at skjóta inn í <u>bankarnar</u> - uttan útgreining av, hvussu nógv skal í hvønn bankan - kr. 1,3 mia. Øllum hesum stendur Føroya landsstýri fyri við lántøku úr danska statinum.

Tá partabrævabýtið fór fram við landsstýrisins góðkenning í mars í ár, og tá tað í august í ár varð alment, at bankarnir skuldu leggja saman, varð hetta gjørt eftir tilráðing frá fyrst og fremst fíggingargrunninum og danska forsætismálaráðnum. Sum siðvenja hevur verið í danska ríkinum, so skal ein slík samanlegging góðkennast av fíggjareftirlitinum, helst einamest fyri at tryggja partaeigarunum, at virðismetingin av partabrøvunum í bankunum báðum er sambærilig, so at báðir partar fáa líka burtuúr.

Tølini omanfyri kundu beut á, at DDB er sloppin ov væl, serliga um neyðugt verður eina ferð aftrat at skjóta pening inn í bankarnar.

Tá Sjóvinnubankin 6. oktober í fjør fyrstu ferð skuldi hava hjálp, varð trygd fingin fyri, at tað almenna ikki skuldi hugsa um Føroya Banka, tí hetta vildi Den Danske Bank taka sær av. Brot úr fundarfrágreiðing 2. oktober í fjør frá fundi millum fíggjareftirlitið og Sjóvinnubankan er soljóðandi:
"Det blev oplyst, at gennemgangen af P/f Føroya Banki's engagementer var blevet gennemført og vurderingerne sammenholdt med vurderingerne med P/f Sjóvinnubankin. Men til forskel fra P/f Sjóvinnubankin har P/f Føroya Banki en stærk hovedaktionær, nemlig Dan Danske Bank, Eigil Mølgård oplyste, at han fra Knud Sørensen havde fået bekræftet, at DDB vilde stå ved sine forpligtelser overfor deres datterselskab på Færøerne og tilføre den nødvendige garantikapital og likviditet."

Tað er nógv, sum bendir á, at DDB er sloppin væl betri enn tær almennu Føroyar, og at DDB neyvan hevur hildið tað lyftið, sum okkum varð givið um "nødvendig garantikapital og

likviditet". Tá nú ivasamar røddir úr báðum samgongum ferð eftir ferð hava verið frammi og sett spurnartekin við rættleikan í at bjarga bankunum á henda hátt, so heldur fólkaflokkurin, at tað má vera rætt og av almennum áhuga at fáa nevndu kanning gjørda.

Alt tað neyðuga tilfarið má haldast at vera tøkt. Tí er ein kanning sum henda løtt og einføld at gera. Landsstýrið kundi biðið tríggjar sakkønar um at gjørt hetta arbeiðið. Tríggir uttanveltaðir persónar eru lættir at finna.

At enda eigur at verða lagt aftrat, at fíggjareftirlitið frammanundan kanningunum í august í fjør yvir fyri Sjóvinnubankanum legði dent á, at báðir bankarnir skuldu kannast samstundis. Hetta varð ikki so, tí onkur av teimum, sum skuldu koma til Føroya Banka, segðist at "vera vorðin sjúkur".

Eisini eigur at verða mint á, at avtala varð 6. oktober gjørd við Eigil Mølgård um, at pressuskriv skuldi koma frá DDB samstundis sum frá Sjóvinnubankanum, men pressuskrivið frá DDB varð steðgað.

Endaliga eigur at verða havt í huganum, at DDB hevur ikki havt so lítla ávirkan á "uppruddingararbeiðið".

1. viðgerð 29. oktober 1993. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 16. november 1993 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 27. oktober 1993 og eftir 1. viðgerð 29. oktober 1993 beint í rættarnevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við:

Maritu Petersen, løgmann
Jógvan Sundstein, fyrrverandi løgmann
Finnboga Ísakson, landsstýrismann í fíggjarmálum
Kára Petersen, fíggjarstjóra og
Sigurd Poulsen, landsbankastjóra

Umframt hevur nevndin fingið ymisk skriv og fundarfrágreiðingar, sum lýsa framferðina í málinum reiðiliga væl.

Út frá tilfarinum og fundum metir ein meiriluti, at orsøk kann vera at halda

- at Dan Danske Bank hevur ikki hildið tað lyfti um fíggjarligan stuðul til Føroya Banka og til føroyska samfelagið, sum metist at vera givið 2. oktober 1992,
- at Dan Danske Bank kann hava villleitt landsstýrið, tá partabrævabýtið fór fram 22. mars 1993,
- at orsøk er fyri at seta spurnartekin við ta ráðgeving, sum landsstýrið hevur fingið frá Fíggingargrunninum, statsministaranum og frá bankaeftirlitinum,
- at landsstýrið kann hava tikið avgerðina um partabrævabýtið út frá skeivum fortreytum og ikki mett ella fingið upplýsing um møguligan meiritørv av peningi til bankarnar.

- at tað má tykjast løgið, at kapitaltørvurin vaks knappliga eftir, at partabrævabýtið var farið fram, og eftir at fusiónin varð avtalað ella trýst ígjøgnum.

Grundað á hetta setir **ein meiriluti** (Helena Dam á Neystabø, Lisbeth L. Petersen og Birgir Danielsen) fram soljóðandi broytingaruppskot til uppskotið til samtyktar.

Broytingin snýr seg um at stíla málið til forsætismálaráðharran og ikki, sum skotið upp, til landsstýrið.

U p p s k o t

til

samtyktar

Í uppskotinum til samtyktar verður aftan á orðini "verður álagt landsstýrinum" sett: at heita á forsætisráðharran at seta í verk eina óhefta og serkøna kanning" í staðin fyri orðini "at seta eina kanning".

Eitt minniluti (Mikkjal Sørensen og Hans Tausen Olsen) vísir á, at undir viðgerðini í nevndini er komið fram, at landsstýrið arbeiðir við málinum. Minnilutin tekur ikki undir við, at málið verður tikið úr hondunum á landsstýrinum, og setir sostatt einki uppskot fram.

2. viðgerð 23. november 1993. Uppskotið fall við 16-0 atkvøðum.

37 Ígildissetan fyri Føroyar av sáttmála um vanligu vápnaðu herliðini í Europa og lóg um eftirlit við vanligu vápnaðu herliðunum í Danmark

Ár 1993, týsdagin 16. november legði Signar á Brúnni, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at sáttmáli frá 19. november 1990 um vanligu vápnaðu herliðini í Europa og lóg nr. 7 frá 3. januar 1992 um eftirlit við vanligu vápnaðu herliðunum í Danmark verða sett í gildi fyri Føroyar.

Viðmerkingar:

Við skrivi dagfest 23. mars 1993 hevur ríkisumboðið spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at sett verður í gildi fyri Føroyar lóg nr. 7 frá 3. januar 1992 um eftirlit við vanligu vápnaðu herliðunum í Danmark og kunngerð nr. 618 frá 13. juli 1992 um ígildisseting av lóg um eftirlit við vanligu vápnaðu herliðunum í Danmark.

Við skrivi dagfest 26. august 1991 bað ríkisumboðið landsstýrið um ummæli viðvíkjandi uppskoti til lóg um eftirlit við vanligu vápnaðu herliðunum í Danmark, og boðaði landsstýrið tá frá, at tað ongar viðmerkingar hevði til lógaruppskotið, men at lógin og sáttmálin skuldi leggjast fyri heimastýrið, áðrenn tey kundu lýsast í Føroyum.

Lógin hevur til endamáls at lúka sáttmála frá 19. november 1990 um vanligu vápnaðu herliðini í Europa (CDE-sáttmálin), soleiðis at Danmark kann seta í gildi sáttmálan, ið ríkisleiðarar úr 22 londum, herímillum Danmark, undirskrivaðu í sambandi við CSCE-toppfundin í París tann 19.-21. november 1990.

Fyri at tað skal vera gjørligt hjá Danmark at seta í gildi sáttmálan, er tað neyðugt, at tað í donskum rætti verður heimilað at gera reglur, sum standa í eftirlitsbókini í sáttmálanum, um rættin hjá eftirlitsfólki at koma inn á ávís øki, ið sum meginregla kunnu vera privat ogn.

Hetta kann verða gjørt á tann hátt, at tað við lóg antin verður gjørd heimild fyri dómstólarnar at veita eftirlitsfólki rættarúrskurð til privata ogn, ella at tað sum eitt serstakt undantak við lóg verður gjørd heimild fyri eftirliti uttan rættarúrskurð.

Eftir sáttmálanum skulu eftirlitsfólk frá øðrum londum, ið hava tikið undir við sáttmálanum, við góðkenning verjumálaráðharrans sleppa at eftirkanna, um Danmark heldur skyldur sínar sambært sáttmálanum.

Eftirkanningarnar, ið verða gjørdar undir leiðslu av donskum heryvirmonnum, kann fevna um ogn hjá verjuni eins væl og privata ogn.

Tað landið, har eftirlitið verður gjørt, hevur rætt at nokta tílíkum eftirliti. Hendir tað, skal landið geva eina rímiliga trygging um, at tað ikki í tí ávísa økinum eru vápn og útbúnaður, ið er avmarkaður við sáttmálanum.

Í sáttmálanum siga londini m.a., at tey "**handla við tilvitanini um tað neyðuga í at hindra einihvørjari hernaðarligari ósemju í Europa**". "**eru tilvitandi um ta felags ábyrgd, sum tey øll hava fyri at royna at fáa størri støðufesti og tryggleika í Europa**" og "**royna at býta hernaðarligar konfrontatiónir um við eitt nýtt mynstur fyri trygdarligu sambondunum millum luttakararøkini, sum er grundað á friðarligt samarbeiði og harvið virka fyri at vinna yvir býtinum av Europa**".

Eftir sínum innihaldi fevnir nýtsluøki sáttmálans eisini um Føroyar.

Mælt verður løgtinginum til at samtykkja, at nevndu sáttmáli og lóg kunnu setast í gildi fyri Føroyar.

1. viðgerð 19. november 1993. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 15. februar 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 11. november 1993 og eftir 1. viðgerð 19. november 1993 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið um "Ígildissetan fyri Føroyar av sáttmála um vanligu vápnaðu herliðini í Europa og lóg um eftirlit við vápnaðu herliðunum í Danmark". Nevndin hevur í hesum sambandi havt fund við Jalgrím Hilduberg, skrivstovustjóra í landsstýrinum, og A. M. Dam, fulltrúa í landsstýrinum, til tess at tryggja sær, at einki í sáttmálanum ella í donsku lógini kann elva til trupulleikar í Føroyum. Jalgrím Hilduberg og A. M. Dam greiddu frá, at Føroyar átaka sær ongar nýggjar skyldur við at samtykkja henda sáttmála, heldur ikki fáa Føroyar nýggjar heimildir. Spurdur, um støðu Føroya í NATO hevur nakað við sáttmálan at gera, metti Jalgrím Hilduberg ikki, at so var.

Danmark hevur gjørt henda sáttmálan við 22 onnur lond um sínámillum eftirlit og somuleiðis samtykt lóggávu, ið heimilar eftirlit við vápnaðum herliðum í Danmark. Endamálið við sáttmálanum er at minka um spenningin millum lond og sostatt slóða fyri friði. Hesin sáttmálin stuðlar sostatt ætlan løgtingsins, sum er orðað í trimum løgtingssamtyktum, um, at vápn og vápnaútbúnaður ikki eigur at vera í Føroyum. Ríkisstjórnin metir, at tað er neyðugt, at eisini Føroyar verða fevndar av sáttmálanum, og eru Føroyar nevndar í "Traktatens anvendelsesområde". Sáttmálin merkir, at lond, sum hava undirskrivað sáttmála, hava rætt til at kanna eftir, um lond halda skyldur sínar sambært sáttmálanum. Hesar kanningar verða framdar eftir serligum avtalaðum reglum bæði á hernaðarligum øki og á privatum øki og kunnu, um løgtingsmál nr. 37 verður samtykt, eisini fara fram í Føroyum.

Ein samd rættarnevnd mælir við hesum viðmerkingum løgtinginum til at samtykkja málið.

2. viðgerð 17. februar 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

38 Ígildissetan fyri Føroyar av útlendingalógini

Ár 1993, týsdagin 16. november legði Signar á Brúnni, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at útlendingalógin, lóg nr. 226 frá 8. juni 1983 við seinni broytingum, verður sett í gildi fyri Føroyar.

Viðmerkingar:

Útlendingalógin, sum er galdandi fyri Føroyar, er lóg nr. 224 frá 7. juni 1952, sum broytt við lóg nr. 104 frá 21. apríl 1958, jbr. lógarkunngerð nr. 20 frá 7. februar 1961.

Tá nýggja útlendingalógin í Danmark varð gjørd, varð sagt, at arbeiðið fyrst og fremst átti at miða ímót at veita útlendingum størri rættartrygd, og hevði Fólkatingsins Umboðsmaður gjørt vart við, at í tágaldandi lógini vóru reglurnar ov ógreiðar og ikki nóg nágreiniligar. Í núgaldandi lóg er stórur dentur lagdur á rættartrygdina hjá útlendingum, og lógin kann eisini sigast at vera tillagað millumtjóða viðurskiftunum. Hon miðar ímóti eini menniskjaligari framferð mótvegis útlendingum, og í heila tikið at betra rættartrygdina í sambandi við viðgerðina av tílíkum málum.

Tá økið er felagsmál, kann tað eisini geva praktiskar trupulleikar, at tað ikki eru somu reglur, sum eru galdandi. T.d. er tað løgmálaráðið, sum enn viðger mál í sambandi við flóttafólk í Føroyum, meðan tað í Danmark er Direktoratet for Udlændinge, og er hetta tann stovnurin, ið má sigast nú at hava serkunnleikan á økinum.

Málið hevur verið til ummælis hjá Landfútanum, ið mælir til, at nýggja útlendingalógin við broytingum verður sett í gildi í Føroyum.

Hjálagdar eru:
1) Útlendingalóg nr. 226 frá 8. juni 1983 og uppskotið til lógina við viðmerkingum.
2) Lóg nr. 232 frá 6. juni 1985 um broyting í útlendingalógini.

3) Lóg nr. 574 frá 19. desember 1985 um broyting í útlendingalógini.
4) Lóg nr. 686 frá 17. oktober 1986 um broyting í útlendingalógini.
5) Lóg nr. 387 frá 6. juni 1991 um broyting í útlendingalógini.
6) Lóg nr. 386 frá 20. mai 1992 um broyting í ávísum lógum innan øki løgmálaráðsins (Gjaldásetingar).
7) Lóg nr. 482 frá 24. juni 1992 um broyting í útlendingalógini v.m.

A. <u>Lóg nr. 226 frá 8. juni 1983:</u>

1. Tá Føroyar ikki eru limir í EF, eiga serstøku reglurnar í lógini um atgongd til landið og uppihald í landinum hjá útlendingum, sum koma undir EF-reglurnar, ikki at verða settar í gildi. Hesar reglur standa í pkt. 1-5, pkt. 7 og pkt. 9-14.

2. Skipaskráseting er føroyskt sermál. Skip, ið standa í føroysku skipaskrásetingini, sigla undir føroyskum flaggi, og eigur broyting at verða gjørd í § 13, stk. 1, 2. pkt. soleiðis, at "dansk" í báðum støðum verður broytt til: "færøsk".

3. Arbeiðsmarknaðarviðurskifti og harvið arbeiðsloysistrygging er føroyskt sermál, og tí verður í § 16, stk. 1 "Arbejdsministeren" broytt til: "Landsstyret".

4. Lógin hevur í kapittul 10 ásetingar um gildiskomu og skiftisreglur. Her eigur § 63 at verða broytt, meðan hinar greinirnar, §§ 64-66, ganga út.

Mælt verður til, at lóg nr. 226 frá 8. juni 1983 verður sett í gildi fyri Føroyar við hesum broytingum:

1) § 2 verður strikað.
2) Í § 5, stk. 1 verður "§§ 2-4" broytt til: "§§ 3-4".
3) § 6 verður strikað.
4) Í § 10 verður "§§ 6-9" broytt til: "§§ 7-9".
5) § 11, stk. 3 verður strikað.
6) Í § 13, stk. 1, 2. pkt. verður orðið "dansk" í báðum støðum broytt til: "færøsk".
7) § 14, stk. 1, nr. 2 verður strikað.
8) Í § 16, stk. 1 verður "Arbejdsministeren" broytt til: "Landsstyret".
9) § 19, stk. 4 verður strikað.
10) § 28, stk. 1, nr. 4, 2. pkt. verður strikað.
11) § 28, stk. 2, 2. pkt. verður strikað.
12) § 29, stk. 4 verður strikað.
13) Í § 33, stk. 3, 1. pkt. verða strikað orðini "enten er omfattet af EF-reglerne, jfr. § 2, eller".
14) § 52, stk. 1, nr. 3 verður strikað.
15) § 52, nr. 4, pkt. b, verður strikað.
16) Í § 60, stk. 2, 2. pkt. verður "§ 2, stk. 3" strikað.
17) § 63 verður orðað soleiðis:
"**§ 63.** Loven træder i kraft dagen efter, at den er kundgjort i "Kunngerðablaðið" og samtidig ophæves lov nr. 224 af 21. april 1958 om udlændinges adgang til landet m.v. som ændret ved lov nr. 104 af 21. april 1958, jfr. lovbekendtgørelse nr. 20 af 7. februar 1961."
18) §§ 64-66 verða strikaðar.

B. Lóg nr. 232 frá 6. juni 1985 um broyting í útlendingalógini.
Mælt verður til, at lógin verður sett í gildi fyri Føroyar.

C. Lóg nr. 574 frá 19. desember 1985 um broyting í útlendingalógini.
Mælt verður til, at lógin verður sett í gildi fyri Føroyar.

D. Lóg nr. 686 frá 17. oktober 1986 um broyting í útlendingalógini.
Mælt verður til, at lógin verður sett í gildi fyri Føroyar.

E. Lóg nr. 387 frá 6. juni 1991 um broyting í útlendingalógini.
Mælt verður frá at seta lógina í gildi fyri Føroyar, tá Føroyar ikki eru limir í EF, og endamál lógarinnar er at gera tað møguligt hjá Danmark at staðfesta EF-asylkonventiónina. Landfútin hevur tó mælt til, at § 1, nr. 1 verður sett í gildi fyri Føroyar.
§ 1, nr. 1 er soljóðandi:
"I § 7, stk. 2, indsættes som 2. pkt.:
En ansøgning som nævnt i 1. pkt. anses også som en ansøgning om opholdstilladelse efter stk. 1."

Landsstýrið tekur undir við tilmæli landfútans.

F. Lóg nr. 386 frá 20. mai 1992 um broyting í ávísum lógum innan øki løgmálaráðsins. (Gjaldásetingar).
Mælt verður til, at § 7 verður sett í gildi fyri Føroyar.

G. Lóg nr. 482 frá 24. juni 1992 um broyting í útlendingalógini v.m. (Familiesammenføring, effektivisering af asylsagsbehandlingen m.v.).
Mælt verður til, at § 1 verður sett í gildi fyri Føroyar við hesum broytingum:
Í § 1, nr. 4 verður í § 9, stk. 5 "lov om social bistand" broytt til: "lov for Færøerne om offentlig forsorg" og í tveimum støðum "kommunalbestyrelsen" broytt til: "landsstyret".

Mælt verður løgtinginum til at samtykkja, at útlendingalógin og broytingarlógirnar kunnu setast í gildi í Føroyum við teimum broytingum, sum skotnar eru upp frammanfyri.

1. viðgerð 19. november 1993. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 15. februar 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 11. november 1993 og eftir 1. viðgerð 19. november 1993 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið um at seta donsku útlendingalógina frá 8. juni 1983 við seinni broytingum í gildi í Føroyum.

Til tess at fáa málið lýst, hevur nevndin havt fund við Jalgrím Hilduberg, skrivstovustjóra í landsstýrinum, og A. M. Dam, fulltrúa í landsstýrinum.

Spurt varð m.a., um løgtingið átekur sær nýggjar skyldur, og varð upplýst, at so er ikki.

Endamálið er einans at fáa greiðari og betri skipaða mannagongd, millum annað at spurningar um útlendinga- og flóttafólkamál úr Føroyum fáa somu málsviðgerð sum í Danmark. Endamálið er eisini at betra rættartrygdina hjá útlendingum og flóttafólki. Teir kærustovnar, ið eru settir á stovn í Danmark, koma við hesi lóg eisini at fevna um útlendingar og flóttafólk í Føroyum.

Eins og áður hava føroyskir myndugleikar ongan avgerðarrætt, bert ummælisrætt í spurningum um at geva útlendingum og flóttafólki innferðarloyvi og onnur rættindi í Føroyum. Hvørt hetta er rætt, er ein spurningur, sum einki hevur við hetta mál at gera, av tí at økið framvegis er felagsmál.

Tað eru í teimum donsku lógunum, sum eru lagdar fyri tingið, framdar broytingar, ið leggja upp til, at Føroyar ikki eru limir í ES. Tað merkir, at ES-borgarar hava ikki somu rættindi til uppihalds- og arbeiðsloyvi, sum tey hava í ES-limalondum.

Ein samd nevnd kann taka undir við, at lógirnar verða samtyktar soleiðis, sum landsstýrið eftir tilmæli frá landfútanum hevur skotið upp fyri tinginum í punktunum A, B, C, D, E, F og G í viðmerkingunum til løgtingsmál nr. 38/1993.

2. viðgerð 17. februar 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

39 Fyriskipan um ávís tiltøk móti Irak

Ár 1993, týsdagin 16. november legði Signar á Brúnni, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at setast kann í gildi fyri Føroyar fyriskipan um ávís tiltøk móti Irak.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur frá ríkisumboðnum fingið uppskot til fyriskipan fyri Føroyar um ávís tiltøk

móti Irak.

Fyriskipanin er ein fylgja av resolutiónum nr. 661 frá 6. august 1990, nr. 666 frá 13. september 1990, nr. 670 frá 25. september 1990, nr. 686 frá 2. mars 1991, nr. 687 frá 3. apríl 1991 og nr. 778 frá 2. oktober 1992 hjá Trygdarráð Sameindu Tjóða.

Samstundis verður lagt fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um forboð móti handli við Irak, løgtingsmál nr. 40/1993.

Orsøkin til, at talan er bæði um at seta í gildi fyriskipan fyri Føroyar og at seta í gildi løgtingslóg er, at handil er yvirtikin sum sermál, meðan uttanríkismál eru felagsmál.

Í Danmark eru tiltøkini sett í gildi við fyriskipan nr. 124 frá 12. mars 1993 um ávís tiltøk móti Irak.

Higartil hevur verið í gildi í Føroyum fyriskipan nr. 661 frá 28. september 1990 um ávís tiltøk móti Irak, og fevnir henda fyriskipan eisini um Kuweit.

1. viðgerð 19. november 1993. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 18. desember 1993 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 11. november 1993 og eftir 1. viðgerð 19. november 1993 beint í marknaðarnevndina, sum viðgjørdi málið á fundi 16. december 1993.

Ein samd nevnd mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 20. desember 1993. Uppskotið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

40 Forboð móti handli við Irak

Ár 1993, týsdagin 16. november legði Signar á Brúnni, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um forboð móti handli v.m. við Irak.

§ 1. Danskir ríkisborgarar, búsitandi í Føroyum, ella skip og flogfør skrásett í Føroyum, ella sum danskir ríkisborgarar ella feløg eiga ella hava leigað, kunnu ikki í Føroyum ella uttanfyri Føroyar inna virksemi ella gerðir, ið hava til endamáls at fremja tílíkt virksemi, sum nevnt undir nr. 1-3:

1) Innflutningur til Føroya av vørum við uppruna í Irak.
2) Útflutningur ella umskiping av vørum úr Irak, semja um rættargerðir viðvíkjandi slíkum vørum og flutningur av teimum.
3) Søla og flutningur ella onnur veiting til Irak til persónar ella virkir í Irak, ella virkir, ið verða rikin úr Irak við vørum uttan mun til upprunaland.

Stk. 2. Ásetingin í stk. 1 fevnir ikki um veitingar einans til læknafrøðiliga nýtslu og ikki um mat.

§ 2. Til útflutning úr Føroyum av vørum, ið koma undir § 1, stk. 2, krevst útflutningsloyvi frá landsstýrinum.

§ 3. Ásetingarnar í § 1 eru ikki galdandi fyri vørur við uppruna uttan fyri Irak, ið verða fluttar gjøgnum Irak ella bráðfeingis eru í Irak bert fyri at verða sendar víðari í samsvari við tey stevnumið, sum góðkenningarnevndin hjá Trygdarráð Sameindu Tjóða ásetur.

lagtingslov om forbud mod handel m.v. med Irak.

§ 1. Virksomhed, som nævnt under nr. 1-3 eller handlinger, der har til formål at fremme sådan virksomhed, må ikke udøves på Færøerne eller uden for Færøerne af danske statsborgere bosiddende på Færøerne eller med fly eller med skib indregistreret på Færøerne eller chartret af danske statsborgere eller selskaber:

1) Indførsel til Færøerne af varer med oprindelse i Irak.
2) Udførsel eller omladning af varer fra Irak, indgåelse af retshandler vedrørende sådanne varer samt transport heraf.
3) Salg og transport til eller anden forsyning af Irak, personer og virksomheder i Irak, eller virksomheder, der drives fra Irak med varer uanset oprindelsesland.

Stk. 2. Bestemmelsen i stk. 1 omfatter ikke leverancer udelukkende til medicinsk brug samt levnedsmidler.

§ 2. Udførsel fra Færøerne af varer, som er omfattet af § 1, stk. 2, kræver udførselstilladelse, der udstedes af landsstyret.

§ 3. Bestemmelserne i § 1 finder ikke anvendelse for varer med oprindelse uden for Irak, som transporteres i transit igennem Irak, eller midlertidigt befinder sig i Irak, alene med henblik på transit i overensstemmelse med de retningslinier, som fastsættes af FN's Sikkerhedsråds sanktionskomité.

§ 4. Endurgjaldskrøv frá myndugleikum í Irak, frá løgfrøðiligum og likamligum persónum í Irak ella krøv teirra vegna í sambandi við sáttmálar ella onnur tiltøk, hvørs framjing ásetingarnar í hesi lóg hava forðað, kunnu ikki setast.

§ 4. Erstatningskrav fra myndigheder i Irak, fra juridiske og fysiske personer i Irak eller krav på deres vegne i forbindelse med kontrakter eller andre transaktioner, hvis gennemførelse er blevet hindret på grund af bestemmelserne i denne lov, vil ikke kunne rejses.

§ 5. Persónar, herupptí nevndarlimir í virkjum, ið gera brot á § 1, verða revsaðir eftir § 110 c, stk. 2 í borgarligu revsilógini, við bót, hefti ella undir herðandi umstøðum við fongsli í upp til 4 ár.
Stk. 2. Er brotið á § 1, stk. 1, framt av einum partafelag, lutafelag, smápartafelag ella líknandi, kann verða álagt felagnum sum slíkum bót.

§ 5. Personer, herunder bestyrelsesmedlemmer i virksomheder, der overtræder § 1, straffes efter § 110 c, stk. 2, i borgerlig straffelov med bøde, hæfte eller under skærpende omstændigheder med fængsel indtil 4 år.
Stk. 2. Er overtrædelser af § 1, stk. 1, begået af et aktieselskab, andelsselskab, anpartsselskab eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar.

§ 6. Hald skal leggjast á vinning frá gerðum, ið eru revsiverdar sambært § 1, § 75, stk. 1, 2. pkt., § 76, stk. 1 og stk. 3-5 og § 77, stk. 1 og 3, eru eisini galdandi viðvíkjandi inndrátti eftir hesi áseting.

§ 6. Udbyttet ved handlinger, der er strafbare efter § 1, skal konfiskeres. Straffelovens § 75, stk. 1, 2. pkt., § 76, stk. 1 og stk. 3-5 og § 77, stk. 1 og 3, finder tilsvarende anvendelse på konfiskation efter denne bestemmelse.

§ 7. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 7. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur frá Ríkisumboðnum fingið skriv dagfest 5. oktober 1993 um at seta í gildi løgtingslóg um forboð móti handli við Irak.

Samstundis verður lagt fyri tingið uppskot til samtyktar um at setast kann í gildi fyriskipan fyri Føroyar um ávís tiltøk móti Irak, løgtingsmál nr. 39/1993.

Bæði lógin og fyriskipanin eru ein fylgja av resolutiónunum nr. 661 frá 6. august 1990, nr. 666 frá 13. september 1990, nr. 670 frá 25. september 1990, nr. 686 frá 2. mars 1991, nr. 687 frá 3. apríl 1991 og nr. 778 frá 2. oktober 1992 hjá Trygdarráð Sameindu Tjóða.

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja lóg um forboð móti handli v.m. við Irak.

1. viðgerð 19. november 1993. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 18. desember 1993 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 11. november 1993 og eftir 1. viðgerð 19. november 1993 beint í marknaðarnevndina, sum viðgjørdi málið á fundi 16. december 1993.

Ein samd nevnd nælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 20. desember 1993. Uppskotið samtykt við 30-0 atkvøðum.

3. viðgerð 28. desember 1993. Uppskotið endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

Lóg nr. 16 frá 27. januar 1994.

FL jnr. 26-1/90.

41 Ratifikatión av "De Forenede Nationers Rammekonvention om Klimaændringer"

Ár 1993, týsdagin 16. november legði Signar á Brúnni, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at Føroyar taka undir við danskari ratifikatión av "De Forenede Nationers Rammekonvention om Klimaændringer", sum Danmark undirskrivaði á ST-ráðstevnu um umhvørvi og menning í Rio de Janeiro 9. juni 1992.

Viðmerkingar:
Danski umhvørvismálaráðharrin undirskrivaði í juni 1992 á UNCED-ráðstevnuni í Rio de Janeiro rammusáttmálan um veðurlags-broytingar, og hevur Fólkatingið í mars 1993 givið sítt samtykki til, at Danmark ratifiserar sáttmálan. Sáttmálin kemur í gildi, tá ið hann er ratifiseraður av 50 londum.

Sáttmálin ásetir í grein 24, at fyrivarni ikki kann verða gjørt yvirfyri sáttmálanum, og merkir hetta, at Danmark ikki við ratifikatiónini kann gera undantak viðvíkjandi Føroyum.

Danmark ætlar at ratifisera sáttmálan samstundis sum EF, t.e. síðst í november ella fyrst í desember mánaði, og verður tí heitt á føroyskar myndugleikar um at fráboða sína støðutakan innan hetta tíðspunkt.

Endamálið við sáttmálanum er sambært grein 2 at stabilisera konsentratiónina av vakstrarhúsgassum í luftini, soleiðis at gassini ikki á vandamiklan hátt ávirka veðurlagsskipanina.

Fyri at tryggja hesum endamáli, átaka sáttmálapartarnir sær eftir § 4 seinast 6 mánaðir eftir, at sáttmálin er komin í gildi, at útvega eina neyva ætlan fyri hvussu útleiðingin av vakstrarhúsgassum kann koma ájavnt útleiðingina í 1990.

Somuleiðis ásetir grein 4, at partarnir skulu gera upp, hvussu nógv verður leitt út av vakstrarhúsgassum, at partarnir skulu menna tøknifrøði, sum minkar um hesa útleiðing, reglur um umskifti av upplýsingum, v.m.

Sambært grein 12 hava partarnir skyldu at fráboða "partaráð-stevnuni", sum er ráðstevna, har partarnir regluliga hittast, um tey í grein 4 umrøddu viðurskifti.

Eftir greinunum 5 og 6 skulu partarnir samstarva um m.a. gransking, undirvísing og fólkaupplýsing.

Grein 11 ásetir, at tað skal gerast ein skipan, sum skal fáa fíggjarligt tilfeingi tilvega, antin sum studningur ella sum fyrimunarligar treytir. Skipanin liggur undir "partaráðstevnuni".

Um Danmark ratifiserar sáttmálan verður danska ríkið sum so partur í sáttmálanum. Tað áliggja sostatt ikki Føroyum sjálvstøðuga fráboðanarskyldu til "partaráðstevnuna", eins og Føroyar bert sum partur av kongaríkinum hava skyldu at gjalda í fíggingarskipanina.

Danska umhvørvismálaráðið hevur uppá fyrispurning upplýst, at ásetingin um at gjalda til fíggingarskipanina ikki kemur at ávirka føroysku fíggjarlógina. Somuleiðis upplýsir umhvørvismálaráðið, at leikluturin hjá Føroyum í sambandi við fráboðanarskylduna eftir grein 12, er ein spurningur sum má takast upp millum danskar og føroyskar myndugleikar.

Rammusáttmálin um veðurlagsbroytingar hevur verið til ummælis hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, og viðmælir hon, at heimastýrið tekur undir við danskari ratifikatión av sáttmálanum.

Mælt verður til, at ein møgulig føroysk góðkenning verður gjørd við tí fyrivarni, at samráðast má um býtið av útreiðslunum, sum stava frá umsitingini av teimum pørtunum í sáttmálanum, sum hoyra undir føroyskt heimastýri.

1. viðgerð 19. november 1993. Málið varð beint í umhvørvisnevndina, sum 23. november 1993 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 16. november 1993 og eftir 1. viðgerð 19. november 1993 beint í umhvørvisnevndina.

Málið snýr seg um at ratificera sáttmálan um veðurlagsbroytingar. Nevndin hevur havt fund við landsstýrismannin Signar á Brúnni. Spurningurin um avleiðingar fyri Føroyar varð umrøddur.

Nevndin hevur ta áskoðan, at Føroyar eiga at verða við í slíkum altjóða arbeiði og tekur tí undir við málinum og mælir ein samd nevnd løgtinginum at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 25. november 1993. Atkvøðugreiðslan útsett til 2. desember 1993. Uppskotið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

FL jnr. 2750-8/90.

42 Løgtingslóg um brenni- og samskiftisstudning til ávísar pensjónistar v.fl.

Ár 1993, týsdagin 16. november legði Signar á Brúnni, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um brenni- og samskiftisstudning til ávísar pensjónistar v.fl.

§ 1. Í fíggjarárinum 1993 verður úr landskassanum veittur ein brenni- og samskiftisstudningur til pensjónistar við 1.569 kr. til hvønn pensjónist.

§ 2. Brenni- og samskiftisstudningurin verður latin fólki, ið áðrenn 1. oktober 1993 hava fingið játtaða fólkapensjón, avlamispensjón ella einkjupensjón ella

lagtingslov om brændsels- og kommunikationstilskud til visse pensionister m.fl.

§ 1. I 1993 ydes af landskassen et brændsels- og kommunikationstilskud til pensionister på 1.569 kr. til hver pensionist.

§ 2. Brændsels- og kommunikationstilskud ydes til personer, som inden den 1. oktober 1993 har fået bevilget folkepension, invalidepension eller enkepension eller har

hava sent inn umsókn um slíka pensjón, tí rætturin til hana er vunnin, og seinni fáa pensjónina játtaða.

§ 3. Treytin fyri at fáa brenni- og samskiftisstudning er, at pensjónisturin ikki hevur hægri ársinntøku út um pensjónina enn 80.000 kr. fyri hjún og 60.000 kr. fyri støk. Til grund fyri útrokningini verður løgd inntøkan, sum nýtt verður í sambandi við útrokning av pensjónini pr. 1. oktober 1993. Hjúnafelagar, sum bæði eru pensjónistar, eiga ein part í felag.

§ 4. Í fíggjarárinum 1993 verða úr landskassanum eisini veittar fólki, sum tann 1. oktober 1993 fáa hjálp sambært § 13 í forsorgarlógini, 1.569 kr. í brenni- og samskiftisstudningi, undir somu treytum sum fyrisett í § 3 í hesi lóg.

§ 5. Føroya Gjaldstova rindar brenni- og samskiftisstudningin.
Stk. 2. Annars fyrisitur Almannastovan brenni- og samskiftisstudningin.
Stk. 3. Avgerðir, sum Almannastovan hevur tikið, kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri kærunevndina í almannamálum.

§ 6. Brenni og samskiftisstudningurin er ikki skattskyldugur.

§ 7. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

indsendt ansøgning om sådan pension, fordi retten til denne er opnået, og senere får pensionen bevilget.

§ 3. Betingelsen for at få brændsels- og kommunikationstilskud er, at pensionisten ikke har højere årsindtægt udover pensionen end 80.000 kr. for ægtepar og 60.000 kr. for enlige. Til grund for beregningen lægges den indtægt, der anvendes i forbindelse med beregning af pensionen pr. 1. oktober 1993. Ægtepar, som begge er pensionister, får tilsammen en andel.

§ 4. I finansåret 1993 ydes af landskassen også et brændsels- og kommunikationstilskud på 1.569 kr. til personer, der den 1. oktober 1993 modtager hjælp efter forsorgslovens § 13, på samme betingelser som fastsat i § 3 i denne lov.

§ 5. Brændsels- og kommunikationstilskuddet udbetales af Føroya Gjaldstova.
Stk. 2. I øvrigt varetager Almannastovan administrationen af brændsels- og kommunikationstilskuddet.
Stk. 3. Afgørelser, som Almannastovan har truffet, kan inden 4 uger indbringes for det sociale ankenævn.

§ 6. Brændsels- og kommunikationstilskuddet er ikke skattepligtigt.

§ 7. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Síðani 1980/81 hevur verið goldin pensjónistum v.fl. brennistudningur sambært løgtingslóg, ið einans hevur havt gildi fyri viðkomandi fíggjarár. Síðani 1988 hevur saman við brennistudninginum eisini verið latin ein stuðul til lutvísa rindan av samskiftisútreiðslum, so sum fast telefongjald, sjónvarpsgjald og útvarpsgjald.

Til 1990 var brenni- og samskiftisstudningurin 2.200 kr., og var játtanin á fíggjarlógini lagað eftir, at pensjónistar, ið uppfyltu treytirnar í § 3 í lógini, fingu hesa upphædd. Á fíggjarlógini

1989 var játtanin 7.360.000 kr. Síðani 1990 hevur játtanin á fíggjarlógini verið 6.500.000 kr. Upphæddin til hvønn pensjónist er tí seinastu árini lutfalsliga lækkað samsvarandi lækkaðu játtanini. Í 1990 og 1991 var brenni- og samskiftisstudningurin 1.943 kr., meðan hann í 1992 var 1.928 kr.

Sambært upplýsingum frá Almannastovuni er talið av pensjónistum mett at vera 3.142 støk og 1.001 hjún, og brenni- og samskiftisstudningurin fyri 1993 er tí ásettur til 1.569 kr.

1. viðgerð 19. november 1993. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 23. november 1993 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 16. november 1993 og eftir 1. viðgerð 19. november 1993 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðálvur Dimon, Karl Heri Joensen, Hildur Patursson og Lisbeth L. Petersen) førir fram: Ásannandi, at samlaða játtanin á løgtingsfíggjarlógini fyri 1993 er 6,5 mió.kr., tekur meirilutin undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Minnilutin (Óli Breckmann) tekur ikki undir við uppskotinum at skerja livistøðið hjá pensionistum við at skerja brennioljustudningin. Í staðin átti landsstýrið alt fyri eitt at strika oljuavgjaldið, so pensionistar og onnur kundu keypt brenniolju um 1/3 bíligari enn nú. Tíðin má vera komin til, at tingmenn vakna og gevast við hesum óskikki bert at uøkta tørv hins almenna upp á bekostning av Føroya fólki. Oljuavgjaldið er bert eitt av nógvum dømum um, at landskassin hevur eyðrænt búskapin, og Fólkaflokkurin kann ikki taka undir við, at eisini hetta uppskot landsstýrisins rakar tey inntøkuveiku í samfelagnum, nevniliga pensiónistarnar, harðast.

2. viðgerð 25. november 1993. Uppskotið samtykt við 27-0 atkvøðum.

3. viðgerð 25. november 1993. Uppskotið endaliga samtykt við 20-0 atkvøðum.

FL jnr. 1010-4/91.

43 Ratifikatión av "Konvention om den biologiske mangfoldighed (biodiversitetskonventionen)"

Ár 1993, týsdagin 23. november legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at Føroyar taka undir við danskari ratifikatión av "Konventionen om den biologiske mangfoldighed (biodiversitetskonventionen)", sum Danmark undirskrivaði á ST-ráðstevnuni um umhvørvi og menning í Rio de Janeiro 9. juni 1992.

Viðmerkingar:
Danski umhvørvismálaráðharrin undirskrivaði í juni 1992 á UNCED-ráðstevnuni í Rio de Janeiro sáttmálan um biodiversitet, og hevur Fólkatingið í mars 1993 givið sítt samtykki til, at Danmark ratifiserar konventiónina. Konventiónin fær gildi, tá hon er ratifiserað av 30 londum.

Sáttmálin ásetur í § 37, at fyrivarni ikki kann verða gjørt yvirfyri sáttmálanum, og merkir hetta, at Danmark ikki við ratifikatión kann gera undantak viðvíkjandi Føroyum.

Danmark ætlar at ratifiscra sáttmálan samstundis við EF, t.d. síðst í november ella fyrst í desember mánaði í ár, og verður tí heitt á føroyskar myndugleikar, um at fráboða sína støðutakan innan hesa tíðarfreist.

Endamálið við sáttmálanum um biodiversitet er fyrst og fremst at steðga týningini av hóttum lívfrøðiligum sløgum (plantum og dýrum) og at varðveita eina fjøltáttaða vistskipan.

Ein stórur partur av plantu- og djóralívinum á jørðini er hóttur, og um einki verður gjørt, kann hetta hava við sær óbótaligan skaða. Eisini verður hugsað um týning av genum og sløgum, sum hava týdning í landbúnaðinum og heilivágsídnaðinum.

Umframt at varðveita og tryggja eina burðardygga nýtslu av tilfeinginum, hevur sáttmálin til endamáls í størri mun at geva u-londunum rætt at ráða yvir egnum genetiskum tilfeingi og virka fyri einum javnari býti millum u-lond og í-lond av bioteknologi.

Um Danmark ratifiserar sáttmálan, verður danska ríkið sum so partur av konventiónini. Tað áleggur sostatt ikki Føroyum sjálvstøðuga fráboðanarskyldu til "partaráðstevnuna" eins og Føroyar bert sum partur av kongaríkinum hava skyldu at gjalda í fíggjarskipanina.

Mælt verður til, at ein møgulig føroysk góðkenning verður gjørd við tí fyrivarni, at samráðast má um býtið av útreiðslunum, sum stava frá umsitingini av teimum pørtum av sáttmálanum, sum hoyra undir føroyskt heimastýri.

1. viðgerð 25. november 1993. Málið varð beint í umhvørvisnevndina, sum 18. desember 1993 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 23. november 1993 og eftir 1. viðgerð 25. november 1993 beint í umhvørvisnevndina.

Málið snýr seg um at ratificera sáttmálan um biodiversitet. Nevndin hevur havt fund við landsstýrismannin Thomas Arabo. Spurningurin um avleiðingar fyri Føroyar varð umrøddur.

Nevndin hevur ta áskoðan, at Føroyar eiga at verða við í slíkum altjóða arbeiði og tekur tí undir við málinum og mælir **ein samd nevnd** løgtinginum at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 18. desember 1993. Málið endaliga samtykt við 21-0 atkvøðum.

FL jnr. 26-8/91.

44 Ígildissetan fyri Føroyar av lóg um broytingar í lóg um skipatryggleikan og uppskot um kgl. fyriskipan, sum setir í gildi broytingar í lóg um skipatryggleikan

Ár 1993, týsdagin 23. november legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir:

1) **at lóg nr. 115 frá 21. mars 1979 um broytingar í lóg um skipatryggleikan verður sett í gildi fyri Føroyar.**

2) Uppskot til kgl. fyriskipan, sum setur í gildi §§ 7 og 9 (broytingar í lóg um skipatryggleikan (skibsfartens betryggelse og skibes sikkerhed)) sambært broytingarlóg nr. 857 frá 23. desember 1987 (herundir heimildir yvirførdar til Sjófartsstýrið).

Viðmerkingar:

Samsvarandi samstarvsavtaluni millum landsstýrið og Sjófartsstýrið dagfest hin 29. mai 1992 verður lóggávan um skipatryggleikan (lov om skibes sikkerhed, lov om skibsfartens betryggelse) og kunngerðir ásettar við heimild í hesum lógum umframt tekniskar forskriftir settar í gildi fyri Føroyar at galda fyri føroysk skip, aftaná at Sjóvinnufyrisitingin og Sjófartsstýrið (skipaeftirlitið) hava viðgjørt slíkar reglur og vinnan hevur havt høvi til at gera sínar viðmerkingar. Danskar lógir og kunngerðir fáa tó ikki gildi, fyrr enn hesar eisini eru samtyktar av landsstýrinum og kunngjørdar í Kunngerðablaðnum B. Tekniskar forskriftir fáa gildi, tá hesar eru kunngjørdar í Meddelelser fra Søfartsstyrelsen og kunngjørdar í Føroyum.

Sambært lógini um skipatryggleikan er heimild at smíða reglurnar fyri Føroyar við atliti at føroyskum viðurskiftum. Henda skipan hevur víst seg at bera til og eigur at útbyggjast innanfyri karmarnar av felagslóggávuni og samsvarandi altjóða reglum (IMO).

Gjørt verður vart við, at uppskot til kongaliga fyriskipan eisini er lagt fyri fólkatingið.

1. viðgerð 25. november 1993. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 4. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 22. november 1993 og eftir 1. viðgerð 25. november 1993 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og tekur **ein samd nevnd** undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 21. mars 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

FL jnr. 1635-1/90.

45 Viðvíkjandi broyting í kunngerð um innflutning av djórum og smittuberandi lutum

Ár 1993, týsdagin 23. november legði Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið at gera broytingar í kunngerðini um "innflutning av djórum og smittuberandi lutum" soleiðis, at kunngerðin eisini fevnir um skriðdjór og paddur.

Viðmerkingar:

Sambært heimild í løgtingslóg nr. 36 frá 28. februar 1908 við seinni broytingum um fyribyrgingar av smittandi sjúkum hjá húsdjórum v.m. hevur landsstýrið í kunngerð nr. 55 frá 26.5.1983 v. seinni broytingum (kunngerð nr. 136 frá 05.11.1990) í § 1 fyrisett:

"allur innflutningur til Føroya av livandi súgdjórum og fuglum er forboðin".

Endamálið við kunngerðini er at verja móti smittuvanda.

Skriðdjór eru ikki nevnd í kunngerðini, og er hetta helst orsøkin til, at innflutningurin av m.a. skriðdjórum (slangum) hevur vundið nógv upp á seg.

At hædd ikki er tikin fyri hesum í nevndu kunngerð botnar helst í, at lógarsmiðirnir ikki droymdu um, at júst hetta slagið av djórum fóru at gerast "húsdjór" hjá føroyingum.

Umframt at hesi djór sjálvandi kunnu vera smittuelvandi, er vandi eisini fyri, at hesi føra snúltudýr við sær, sum kunnu elva til m.a. vandamiklar virus infektiónir.

Tá endamálið við lógini og kunngerðini er at fyribyrgja smittuvanda, so má tað metast skilaleyst, at møguleikin fyri innflutningi ótálmaður kann fara fram.

Tí eigur landsstýrið beinanvegin at taka neyðug stig at gera broytingar í nevndu reglugerð - ella gera nýggja - soleiðis, at hon eisini kemur at fevna um skriðdjór og paddur.

1. viðgerð 25. november 1993. Málið varð beint í landbúnaðarnevndina. Burturdottið vegna samgonguslit.

46 Skattafrítøka viðvíkjandi krígspensjón og frítøka fyri skerjing av grundupphæddini í fólkapensjón, um pensjónisturin fær krígspensjón

Ár 1993, hósdagin 25. november legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið um

1. **at gera krígspensjónina skattafría og**
2. **at sleppa grundupphæddini í fólkapensjónini undan skerjing av tí, um pensjónisturin fær krígspensjón.**

Viðmerkingar:

Frøin var stór, tá tað endiliga - eftir drúgva seinkan - eydnaðist at fáa donsku borgarligu stjórnina í 1991 og fólkatingið árið eftir at samtykkja at játta krígspensjón til føroyskar sjómenn, sum førdu teim sameindu fisk til matna í árunum 1940-45.

Útgoldna upphæddin til Føroya í ár liggur um 65 mió. kr. tilsamans.

Men gleðin hjá krígssiglarum og teirra avvarðandi var stokkur, tí landsstýrið gjøgnum skattavaldið hevur gjørt sær dælt av hesi sømdargávu til okkara gomlu sjómenn og einkjur teirra og leggur hald á bróðurpartin av pensjónini til tess at økja almennu ovurnýtsluna enn meiri upp á bekostning av krígssiglarunum, sum tískil fáa minna partin av hesi uppibornu pensjón.

Harumframt ávirkar sømdargávan fólkapensjónina niðureftir í so stóran mun, at samlaða útgoldna netto upphæddin eftir skatt hjá okkara vandasiglarum er lítið hægri, enn teir fingu útgoldið í vanligari fólkapensión frammanundan.

Við øðrum orðum hevur landsstyrið gjørt krígspensjónina til einkis og sløkt gleði vónarinnar hjá teimum, sum við lívinum í váða føddu okkum sameindu undir krígnum.

Hetta er enn eitt prógv fyri, at landsstýrið raðfestir tørv landskassans hægri enn rættin hjá tí einstaka borgaranum til eitt líkinda lív.

Uppskotsstillarin loyvir sær at endurtaka, at fíggjarkreppa samfelagsins og hins almenna er orsakað av alt ov høgum skattatrýsti

Hetta uppskot miðar móti at lógfesta, at krígspensiónin verður útgoldin óskerd og skattafrí, og at fólkapensiónin ikki verður sum minst ávirkað av hesi sømdargávu.

1. viðgerð 2. desember 1993. Málið varð beint í skattanevndina, sum 27. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 25. november 1993 og eftir 1. viðgerð 2. december 1993 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Lasse Klein, Jacob Lindenskov, Heini O. Heinesen og Finnbogi Arge) vísir á løgtingsmál nr. 65/1993: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, har málið er avgreitt. Meirilutin setir tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Svend Aage Ellefsen) tekur undir við uppskotinum og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 28. apríl 1994. Málið afturtikið.

47 Grannskoðan av almennum roknskapum
1. Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna

Ár 1994, fríggjadagin 18. februar løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

Álit

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna fyri fíggjarárini 1986-1991 og hjá Ráfiskagrunninum fyri árini 1986-1990 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lógargrundarlag:

Lønjavningargrunnurin:

Ll. nr. 72 frá 22. desember 1951, um avrokning og Lønjavningargrunn Fiskimanna.
Ll. nr. 3 frá 18. februar 1955, um uppískoyti til ll. 72. frá 22/12 1951 um avrokning og Lønjavningargrunn Fiskimanna.
Ll. nr. 2 frá 26. februar 1956, um broyting í ll. 72, frá 22/12 1951.
Ll. nr. 9 frá 3/9-1959 um eykastudning til Lønjavningargrunn Skipsfiskimanna.
Ll. nr. 63 frá 20. november 1959, um uppískoyti til ll. 72, 22/12 1951.
Ll. nr. 16 frá 4. mai 1961, um broyting í ll. 9, frá 3/4 1959 um eykastudning til Lønjavningargrunn Fiskimanna.
Ll. nr. 11 frá 11. mai 1962, um at longja skipanina um studning úr landskassanum til minstuløn og viðbót til fiskaprísin.
Ll.nr. 22 frá 8. mai 1969, um broyting í ll. nr. 72 frá 22.12.1991 um avrokning og Lønjavningargrunn Fiskimanna.
Ll. nr. 59 frá 6. mai 1982, um gjaldsfreist og rentuskyldur Lønjavningargrunn Skipsfiskimanna.
Ll. nr. 48 frá 28. mai 1984 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna v. s. b.
Ll. nr. 106 frá 3. august 1990 um royndaruppboðssølu av fiski (grein 5 um telefonuppboðssølu).
Ll. 111 frá 3. august 1990 um prísískoyti til ráfisk.

Ráfiskagrunnurin:

Lógin um Ráfiskagrunnin fór úr gildi 1. oktober 1990. Áðrenn tað, vóru hesar lógir og kunngerðir í gildi hesum grunni viðvíkjandi:

Ll. nr. 15 frá 5. mai 1975 um Ráfiskagrunn, sum broytt við:
Ll. nr. 11 frá 3. mars 1977,

Ll. nr. 73 frá 18. juli 1983.
Ll. nr. 36 frá 20. mai 1988.
Kunngerð nr. 44 frá 7. mai 1976. reglugerð fyri Ráfiskagrunnin, sum broytt við:
Kunngerð nr. 40 frá 1. mai 1980.
Kunngerð nr. 56 frá 26. september 1981.

2. *Endamál:*

Lønjavningargrunnurin varð settur á stovn við løgtingslóg nr. 69, frá 21. desember 1949, við tí endamálið at tryggja løn føroyska skipsfiskimanna. Henda lóg kom í gildi 1. januar 1950, og samstundis fóru úr gildi kunngerð nr. 6 og nr. 43 frá 1947 um lønjavningargrunn skipsfiskimanna og løgtingslóg nr. 2/1949 um broytingar í hesum kunngerðum.

Fiskimenn við langfaraskipum, fáa um teir biðja um tað, útgoldið forskot uppá hýruna. Henda upphædd verður skuldskrivað reiðarínum og skal sambært lógini um Lønjavningargrunn gjaldast aftur av reiðarínum innan fýra vikur aftaná at landað er.

Ráfiskagrunnurin varð settur á stovn við løgtingslóg nr. 15, frá 5. mai 1975, við tí endamáli, at tryggja tí partinum av føroyska fiskiflotanum, ið avreiðir feskan fisk til fiskavirkir í Føroyum javnan avreiðingarprís fyri longri tíðarskeið.

Harafturat hevði grunnurin til endamáls, at veita stuðul til, ávikavist leggja avgjald á, avreiðingarprísir.

Lógin um Ráfiskagrunnin fór úr gildi 1. oktober 1990.

3. *Fíggjarviðurskifti:*

Lønjavningargrunnurin:

Inntøkur til grunnin

Í lógini um Lønjavningargrunnin varð ásett hvussu stórur partur av søluvirðinum av teimum ymsu fiskasløgunum skuldi gjaldast inn í grunnin. Tað vísti seg rættuliga skjótt, at hetta var ikki nóg mikið, og tí var lýst ein uppískoytislóg til lógina um Lønjavningargrunnin. Henda lóg útvegaði eykainntøkur til landskassan, samstundis sum hon ásetti hvussu stóran part av hesum eykainntøkum Lønjavningargrunnurin skuldi hava.

Lógin var lýst at hava gildi í eitt ár, fram til nýggjárs 1954, men hon var longd ár um ár, seinastu ferð í 1965. Tá var lógin broytt til, at grunnurin fekk ein ávísan stuðul á fíggjarlógini. Eisini henda lóg var lýst fyri eitt ár í senn, seinastu ferð í 1968.

Í 1969 samtykti løgtingið lógina um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna, og er hon í gildi enn, við mongum broytingum (dagføringum). Við hesi lógarbroyting fekk grunnurin sum heild eitt annað innihald, nevniliga at umsita lógarbundnar almennar útgjaldingar.

Umsiting av grunninum

Við lógarbroytingini í 1954 yvirtóku sjóvinnufeløgini umsitingina av grunninum, og er hetta ikki broytt síðani.

At stýra grunninum er vald ein 5-mannanevnd, har Føroya Landsstýri velur ein lim, ið er formaður, Fiskimannafeløgini velja í felag tveir limir, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Føroya Maskinistfelag og Føroya Motorpassarafelag í felag ein lim og Føroya Reiðarafelag ein. Nevndarlimirnir verða valdir fyri 4 ár í senn.

Roknskapur

Inntøkur grunsins eru sambært lógini í tveimum: landskassastuðulin, og tann parturin av søluvirðinum av teimum ymsu fiskasløgunum, sum skal gjaldast í grunnin. Í dag eru rentuinntøkurnar annar parturin av inntøkum grunsins afturat landskassastuðlinum.

Býti av inntøkum grunsins er broytt nógv tey seinnu árini, við tað at landskassans partur er vorðin nógv størri, meðan tað sum goldið verður av søluvirðinum av ávísum fiskasløgunum næstan er fallið burtur.

Ásetingin um hvussu nógv skal gjaldast inn í grunnin, og av hvørjum, er ásett í grein 5 í lógini um lønjavningargrunn.

Fyri at tryggja, at grunnurin kann gjalda út tann neyðuga peningin er honum sambært grein 8 í lógini heimilað at upptaka neyðug lán ella at nýta eginpening.

Lønjavningargrunnurin fær allar sínar rakstrarútreiðslur endurgoldnar úr landskassanum, men skal, sambært skriv landsstýrisins dagfest 21. august 1970 ikki mótrokna rentuinntøkurnar.

Rentu- og umsitingarútreiðslur av forskotsskipanini verða sambært grein 8, 2. stk. bornar av tí útgerðarmanni, hvørs manning hevur fingið forskot. Sambært somu grein 5. stk., skal útgerðarmaðurin innan fýra vikur eftir at landað er, útvega grunninum møguligt forskot aftur.

Roknskaparár grunsins er fíggjarárið, og verður roknskapurin, sambært grein 9, 1. stk., grannskoðaður av teimi eftirlitsmonnum, sum landskassin setur til at grannskoða roknskap landskassans.

Sambært 2. stk. í somu grein skal grannskoðaður roknskapur og frágreiðing nevndarinnar fyri farna árið verða send løgtingi og landsstýri í avriti innan 1. juli á hvørjum ári.

Ráfiskagrunnurin:

Inntøkur til grunnin

Fyri at gera grunnin føran fyri at uppfylla treytirnar í endamálsorðingini, varð veittur árligur stuðul á fíggjarlógini. Fíggjarárið 1975/76. var stuðulin 10 mió.kr. og í 1989 var hann vaksin til 232 mió.kr. Í 1990 var stuðulin 200 mió.kr., tað árið virkaði grunnurin í 10 mánaðir.

Harafturat veitti landskassin, í fíggjarárinum 1975/76, Ráfiskagrunninum 2,0 mió.kr. í ein tiltaksgrunn. Sambært reglugerðini skuldi tiltaksgrunnurin standa órørdur til hann náddi teimum 4 mió.kr., tá hann kundi nýtast sum ískoyti til avreiðingarprísirnar, um nevndin metti tað neyðugt.

Í somu reglugerð varð ásett, at í minsta lagið helvtin av árliga avlopi grunsins varð sett í tiltaksgrunn.

Sambært ársroknskapirnar var meirnýtslan hjá Ráfiskagrunninum árini frá 1986 til 1989 140 mió.kr. Í 1990 gav raksturin 24 mió.kr. í avlopi, og varð hesin peningur, í sambandi við avtøkuna av grunninum, fluttur til Lønjavningargrunnin.

Tá grunnurin varð avtikin í 1990 var eginognin 3,7 mió.kr. flutt til eginognina í Lønjavningargrunninum.

Umsiting

At sita fyri grunninum, at áseta avreiðingarprísir og at áseta avrokningarprís millum grunnin og fiskavirkir, varð sett ein 7-mannanevnd. Hon var mannað soleiðis: Útróðrarfeløgini valdu 1 umboð, Fiskimannafelagið 1, Ráfiskakeyparafelagið 2 og Landsstýrið valdi 3 umboð. Hesi 7 umboðini valdu í felag ein formann, sum skuldi verða óheftur av fiskivinnuni. Tað sama var galdandi fyri varamann formansins.

Dagligu umsitingina av Ráfiskagrunninum hevði Lønjavningargrunnurin.

Roknskapur

Samsvarandi reglugerðini varð roknskapurin grannskoðaður av grannskoðara Lønjavningargrunsins. Sambært reglugerðini skuldi roknskapurin sendast landsstýrinum í seinasta lagi tríggjar mánaðir eftir at roknskaparárið var liðugt.

Í reglugerðini stóð eisini, at nevndin í sambandi við roknskapin skuldi geva frágreiðing um virki grunsins í roknskaparárinum. Tá Ráfiskagrunnurin varð avtikin í 1990 samtykti landsstýrið, at avlopið og tiltaksgrunnur grunsins skuldi flytast til Lønjavningargrunnin.

- - - - -

Niðanfyristandandi er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapunum:

4. *Lønjavningargrunnurin, yvirlit yvir rakstur 1986-1991:*

		1986	1987	1988	1989	1990	1991	Falt
	Inntøkur							
	Studningur úr landsks.	274.608	263.021	411.352	500.707	470.004	378.200	2.297.892
	Part til Ráfiskagr.	60.000	60.000	170.000	232.000	200.000	0	722.000
	Inntøkur, netto	214.608	203.021	241.352	268.707	270.004	378.200	1.575.892
	Útreiðslur							
1.	Minstiv.- og løn v.m.	27.710	32.803	60.469	60.034	66.377	72.299	319.692
2.	Studningur til fisk	85.309	77.685	57.629	73.727	87.539	188.739	570.628
3.	Rakstrarstudningur	91.017	67.329	89.596	97.072	82.650	108.665	536.329
4.	Studningur samanlagt	204.036	177.817	207.694	230.833	236.566	369.703	1.426.649
	Úrslit áðrenn kostnað	10.572	25.204	33.658	37.874	33.438	8.497	149.243
	Kostnaður	3.071	3.783	4.998	5.673	5.592	4.698	27.815
	Úrslit áðrenn rentur	7.501	21.421	28.660	32.201	27.846	3.799	121.428
	Rentuinntøkur	979	1.241	1.387	1.516	1.550	1.598	8.271
	Rentuútreiðslur	7.480	1.866	3.519	7.066	2.717	3.678	26.326
	Úrslit áðrenn avskr.	1.000	20.796	26.528	26.651	26.679	1.719	103.373
	Avskrivað innbúgv	21	56	140	135	129	121	602
	Úrslit áðrenn avset.	979	20.740	26.388	26.516	26.550	1.598	102.771
	Lagt í serligar grunnar	0	19.500	25.000	25.000	25.000	0	94.500
	Ársúrslit	979	1.240	1.388	1.516	1.550	1.598	8.271
	Sundurgreinan av studningi:							
	Mínstaløn	8.053	11.972	15.872	14.052	12.794	11.082	73.826
	Minstivinningur	8.158	10.622	8.712	7.438	16.257	23.092	74.279
	Sjúkraviðbøtur	4.604	4.648	5.428	4.972	6.250	6.631	32.533
	Dagsstudningur	0	0	21.983	24.781	23.154	24.103	94.021
	Frítíðarløn	6.895	5.561	8.474	8.790	7.922	7.391	45.033
1.	**Minstiv.- og løn v.m.falt:**	27.710	32.803	60.469	60.034	66.377	72.299	319.692
	Prísískoyti til saltfisk	4.196	951	837	765	852	1.851	9.451
	Prísískoyti feskfisk	0	0	15.652	23.686	11.633	2.348	53.319
	Prísískoyti um flakavirkir	0	0	0	0	33.711	51.069	84.780
	Prísstudningur	0	0	0	0	0	122.968	122.968
	Útróðrarstudningur	0	0	17.625	26.201	20.255	5.810	69.891
	Feskfiskastudningur	81.113	76.734	21.482	23.076	21.087	4.694	228.186
	Ídnaðarstudningur	0	0	2.033	0	0	0	2.033
2.	**Studningur til fisk falt:**	85.309	77.685	57.629	73.727	87.539	188.739	570.628
	Rakstrarstudningur	87.037	66.443	88.439	94.756	77.287	62.541	476.501
	Flutningsstudningur	137	895	646	107	164	107	2.056
	Brennioljustudningur	3.843	+9	0	0	0	0	3.834
	Innflutningsstudningur	0	0	0	0	1.347	8.005	9.352
	Útflutningsstudningur	0	0	181	779	1.004	291	2.255
	Studningur til eygleiðarar	0	0	330	1.430	1.220	2.998	5.978
	Góðskingarstudningur	0	0	0	0	1.630	9.532	11.162
	Manningarstudningur	0	0	0	0	0	20.797	20.797
	Fiskivinnuroyndir	0	0	0	0	0	1.905	1.905
	Vørumenning á fiskavirkjum	0	0	0	0	0	1.289	1.289
	Varðveiting	0	0	0	0	0	1.200	1.200
3.	**Rakstrarstudn.v.m. falt:**	91.017	67.329	89.596	97.072	82.651	108.665	536.329
4.	**Studn. samanlagt**	204.036	177.817	207.695	230.833	236.566	369.703	1.426.649

5. *Ráfiskagrunnurin, yvirlit yvir rakstur 1986-1990:*

	1986	1987	1988	1989	1990	Samanlagt
Studningur	60.000	60.000	55.000	55.000	160.000	390.000
Eykajáttan	0	0	115.000	177.000	40.000	332.000
Lagt í tiltaksgrunn	0	÷5.000	÷40.000	÷26.000	0	÷71.000
Studningur, netto	60.000	55.000	130.000	206.000	200.000	651.000
Útgoldin prísmunur til fisk	÷89.890	÷71.300	÷194.804	÷225.596	÷172.662	÷764.252
Inngoldin prísmunur til fisk	4.656	9.904	1.321	589	176	16.179
Útgoldin prísmunur netto	÷85.704	÷61.396	÷193.483	÷225.007	÷172.487	738.077
Útgoldin prísmunur til agn	4.656	÷7.709	÷5.864	÷5.606	÷2.854	÷26.689
Prísmunur, netto	÷90.360	÷69.105	÷199.347	÷230.613	÷175.340	÷764.765
Úrslit áðrenn kostnað:	÷30.360	÷14.105	÷69.347	÷24.613	24.660	÷113.765
Kostnaður	÷449	÷200	÷675	÷609	÷657	÷2.590
Avlop/meirmýtsla	÷30.809	÷14.305	÷70.022	÷25.223	24.003	÷116.356
Tikið burturav tiltaksgrunni	30.809	14.305	70.022	25.223	3.719	144.078
Flutt til Løjavningargrunnin	0	0	0	0	÷27.722	÷27.722
Til taks	0	0	0	0	0	0

Viðmerkingar til yvirlit yvir rakstur 1986-1991

1. Roknskaparuppsetan

Samlaði studningurin úr landskassanum árini 1986-1991 hevur sambært roknskapirnar verið 2,3 mia.kr. Av hesum eru uml. 1,4 mia.kr. nýttar til ymsar studningar útgoldnir úr Lønjavningargrunninum, og 0,7 mia.kr. útgoldnar úr Ráfiskagrunninum. Restin er nýtt til fyrisiting, rentuútreiðslur og til at leggja í serligar grunnar.

Rakstrarroknskapurin fyri Lønjavningargrunnin verður uppsettur á tann hátt, at yvirskotið verður ásett til rentuinntøkurnar. Síðani verður tað sum lagt er í serligar grunnar, nettorentuútreiðslur, kostnaður, studningsútreiðslur og partur til Ráfiskagrunnin lagdur aftrat, og alt samanlagt fær heitið »studningur úr landskassanum«.

Samsvar hevur ikki verið ímillum »part til Ráfiskagrunnin« og tær árligu útreiðslurnar Ráfiskagrunnurin hevur havt, vegna tess, at peningur er nýttur úr og lagdur í tiltaksgrunnin.

2. Útreiðslur í mun til játtan á fíggjarlógini 1986-1990

Játtanin til tær ymsu studningsskipanirnar, sum Lønjavningar- og Ráfiskagrunnurin hava umsitið, er í tíðarskeiðinum 1986-1990 ikki nærri útgreinað á fíggjarlógini. Talan er um eina samlaða upphædd á § 16, sum ber heitið »Minstaløn til fiskivinnuna.«

Til tess at lýsa útreiðslurnar útgoldnar úr Lønjavningar- og Ráfiskagrunninum í mun til tær skrásettu útreiðslurnar og játtanirnar sambært landskassaroknskapirnar fyri 1986-1990, er gjørdur ein samandráttur hesum viðvíkjandi:

(mió. kr.)	1986	1987	1988	1989	1990	falt
Samb.landskassaroknskapir:						
- Játtan	265	262	275	505	434	1.741
- Studningsútreiðslur	275	263	336	501	446	1.821
Sambært ársroknskapir hjá Lønjavningargrunninum:						
- Studningur úr landskassanum	275	263	411	501	470	1.920

Av hesum sæst, at tað ikki øll árini er samsvar ímillum tað, sum játtað er á fíggjarlógini, tað sum er skrásett sum játtan og sum útreiðslur í landskassaroknskapinum og tað sum er skrásett sum útreiðslur sambært ársroknskapirnar hjá Lønjavningar- og Ráfiskagrunninum.

Ein orsøk til frávik ímillum játtan og útreiðslur í landskassaroknskapinum er, at løgtingslóg nr. 117 frá 3. oktober 1988 um eykajáttan til grunnar og nevndir viðvíkjandi fiskivinnu uppá 45 mió.kr. til Ráfiskagrunnin, 35 mió.kr. til tiltaksgrunnin hjá Ráfiskagrunninum og 25 mió.-kr. til minstuløn og annan stuðul, ikki er tikin við sum játtan í landskassaroknskapinum.

Sambært hesi lóg verður játtaði peningurin »at taka úr landskassanum/og ella oljugrunninum«. 35 mió.kr. vórðu fluttar beinleiðis úr oljugrunninum.

Eisini kann nevnast, at sambært løgtingslóg nr. 105 frá 8. september 1988 um býti av rakstraravlopi landskassans fyri 1987, vórðu 40 mió.kr. tillutaðar ráfiskagrunninum í 1988 sum eykajáttan.

Játtanin á fíggjarlógini fyri 1989 var upprunaliga 325 mió.kr., men við løgtingslóg nr. 74 frá 3. juli 1989 um eykastuðul til fiskivinnuna, verður játtað »fiskivinnuni ein eykastuðul í fíggjarárinum 1989 upp til 180 mió.kr.« Í brævi til lønjavningargrunnin í januar 1990 bað landsstýrið Lønjavningargrunnin fyri árið 1989 flyta 232 mió.kr. til Ráfiskagrunnin og 25 mió.kr. í serligan grunn til fiskivinnuna.

Rentuinntøkurnar av peningi, ið Ráfiskagrunnurin hevði innistandandi í peningastovnunum, vórðu bókaðar í tiltaksgrunnin (uml. 10 mió.kr. 1986-1988).

Sambært skriv frá landsstýrinum í mars 1991 varð avlopið av játtanini til Ráfiskagrunnin í 1990 + tiltaksgrunnin fluttar til Lønjavningargrunnin til útgjaldan av prísískoyti í 1990 (ialt uml. 28 mió.kr.)

Omanfyrinevndu ógreiðu játtanarviðurskifti, nýtslan úr tiltaksgrunnum hjá Ráfiskagrunninum, millumrokningar ímillum Lønjavningargrunnin og landskassan og ímillum Lønjavningargrunnin og Ráfiskagrunnin, gera tað trupult ár fyri ár at finna fram til, hvønn løgtingið hevur játtað pening til og til hvørji endamál hesin peningur er ætlaður/nýttur til sambært ávikavist landskassaroknskapirnar og ársroknskapirnar hjá Lønjavningar- og Ráfiskagrunninum.

3. Útreiðslur í mun til játtan á fíggjarlóg 1991

Í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið fyri 1991 upplýsti landsstýrið, at minstaløn og

annar stuðul til fiskivinnuna verður nú býttur upp í fimm rakstrarstøð, so greitt sæst, hvussu nógv fer til umsiting, royndir og beinleiðis studningar.

Sambært landskassaroknskapin fyri 1991 er hetta skrásett:

Rakstrarstað/Heiti		Játtan	(mió.kr.) Roknsk.
16422	Lønjavningargrunnurin	5,2	5,2
16436	Lógarbundnar útreiðslur (dagsstudningur, minstaløn o.a.)	70,0	70,0
16441	Studningar	285,5	280,0
16455	Fiskivinnuroyndir u.f. føroysku landleiðina	4,5	10,0
16469	Varðveiting av fjølbroyttum flota	13,0	14,8
		378,2	380,0

Við løgtingslóg nr. 35 frá 7. mai 1991 um stuðul til vørumenning á føroyskum fiskavirkjum, samtykti løgtingið at nýta upp til 12 mió.kr. av játtanini til stuðul til fiskivinnuna til vørumenning á føroyskum fiskavirkjum.

Allar tær játtaðu 378,2 mió.kr. vóru fluttar Lønjavningargrunninum í smáum og inntøkuførdar í einum tali.

Munurin ímillum 378,2 mió.kr. og 380 mió.kr., 1,8 mió.kr., er ein útgjalding av studningi til »Borðoyarnes« til fiskiskap á Flemish Cap, játtað av landsstýrinum í 1989. Somu upphæddir játtaðar til »Hans Erik« og »Sigurfari« vórðu í 1990 goldnar úr serliga grunni IIII (scinni nr. III) í Lønjavningargrunninum.

Løgtingsgrannskoðararnir meta ikki »at tað greitt sæst«, hvat tær ymsu játtanirnar á fíggjarlógini eru nýttar til, hvørki sambært landskassaroknskapin ella sambært ársroknskapin hjá Lønjavningargrunninum, og somuleiðis tykist tað eisini ógreitt, hvat tær ymsu játtanirnar vóru ætlaðar til.

Í viðmerkingum til fíggjarlógaruppskotið fyri 1991 verður annars greitt frá, at nærum allir landskassagrunnar ern avtiknir, m.a. við tí fyri eyga at geva politisku myndugleikunum ein møguleika at gera sær eina mynd av nýtsluni í einum fíggjarári.

Vísandi til omanfyristandandi er hetta ikki hent á fiskivinnuøkinum, tí allar tær 378,2 mió.kr. í 1991 í veruleikanum eru fluttar í grunn. Lønjavningargrunnin, har nýtslan ikki er útgreinað svarandi til játtanina á teim 5 rakstrarstøðunum á fíggjarlógini.

4. Játtan í serligar grunnar

Sambært landskassaroknskapunum bar ein grunnur heitið »Fiskiroyndir á fremmandum høvum« (lán), og ein annar grunnur bar heitið »Praktiskar fiskiroyndir«. Til praktiskar fiskiroyndir eru í tíðarskeiðinum 1986-1991 falt játtaðar 25 mió.kr. á fíggjarlógini. Til fiskirannsóknarstovuna/fiskirannsóknarskip eru í tíðarskeiðinum játtaðar út við 80 mió.kr., 10 mió.kr. eru játtaðar til royndir innan havbúnað, og harumframt er peningur játtaður/nýttur til ávís prosjekt.

Av ársroknskapunum fyri Lønjavningargrunuin framgongur, at peningu harumframt er játtaður í serligar undirgrunnar í Lønjavningargrunninum.

Sambært roknskapunum hjá Lønjavningargrunninum vórðu árini 1988-1990 lagdar falt 75 mió.kr. í serligar grunnar.

Játtaninar í hesar grunnar, landsstýrinum at ráða yvir, framganga ikki av fíggjarlógini, viðmerkingunum til fíggjarlógina ella í fylgiskjølunum til fíggjarlógina hesi árini, men framganga av brøvum til Lønjavningargrunnin/fíggjarnevndina um býti av játtanini til fiskivinnuna.

Í 1991 varð einki útgoldið úr teimum serligu grunnunum, men undir roknskaparpostinum »rakstrarstudningur v.m.« er sambært notu 3 í ársroknskapinum hjá Lønjavningargrunninum talan um tríggjar serligar útreiðslupostar:

- Fiskivinnuroyndir	1,9 mió.kr.
- Vørumenning á fiskavirkjum	1,3 mió.kr.
- Varðveiting	1,2 mió.kr.
falt	4,4 mió.kr.

6. *Lønjavningargrunnurin, yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1985-1991:*

	1986	1987	1988	1989	1990	1991
AKTIV						
Kassapeningur	4	4	4	4	4	4
Bankapeningur	5.153	14.017	1.268	10.231	1.253	4.502
Útistandandi						
Landskassin	24.608	1.527	37.852	53.181	26.732	26.668
Forskotsskipanin	14.555	23.419	27.073	25.664	16.869	25.608
Annað	238	230	159	167	196	101
Rakstrargr. feskfiskatrolaranna	165	183	202	220	239	256
Innbúgv	185	501	1.257	1.217	1.164	1.088
Partur í bygningi	4.507	13.355	16.372	19.441	20.142	20.142
Aktiv samanlagt	49.415	53.236	84.187	110.125	66.600	78.369
PASSIV						
Bankaskuld	28.587	10.853	34.363	34.246	8.828	15.036
Skuld viðv. bygninginum netto	0	5.596	5.968	3.908	3.277	3.033
Ognarar	105	756	451	780	3.688	4.007
Ráfiskagrunnurin	0	0	13.150	28.500	0	0
Ráfiskagrunnur feskfiskatrolaranna	165	183	202	220	239	256
Serligir grunnar	5.819	19.868	12.686	23.588	30.135	30.135
Avsett til EDV	0	0	0	0	0	152
Eginpeningur	14.739	15.980	17.367	18.883	20.433	25.750
Passiv samanlagt	49.415	53.236	84.187	110.125	66.600	78.369

7. *Ráfiskagrunnurin, yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1986-1990:*

AKTIV					
Bankapeningur	39.542	43.086	2.438	1.743	3.719
Útistandandi	1.242	602	133	133	0
Tilgóðahavandi studningur	0	0	13.150	28.500	24.003
Innbúgv	44	40	111	100	0
Aktiv samanlagt	40.828	43.728	15.832	30.477	27.722

PASSIV

Skuld					
Skuld til virkir	4.478	12.729	13.040	26.834	0
Ognarar	50	68	0	0	0
Lønjavningargrunnurin	0	0	0	0	27.722
Skuld samanlagt	4.528	12.797	13.040	26.834	27.722
Tiltaksgrunnur					
Saldo primo	62.570	36.300	30.930	2.792	3.643
Lagt aftorat	0	5.000	40.000	26.000	0
Tikið burturav	÷30.809	÷14.305	÷70.022	÷25.223	÷3.719
Rentur	4.539	3.936	1.884	74	76
Tiltaksgrunnur samanlagt	36.300	30.931	2.792	3.643	0
Passiv samanlagt	40.828	43.728	15.832	30.477	27.722

Viðmerkingar til yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni

1. Eginpeningur

Í § 8, 2. stk. í lógini um Lønjavningargrunnin er ásett, at rentu- og umsitingarútreiðslur av forskotsskipanini bera tann útgerðarmaður, hvørs manning hevur fingið forskot, men Lønjavningargrunnurin hevur øll árini havt eitt roknskaparligt yvirskot, svarandi til bruttorentuinntøkurnar av forskotsskipanini.

Í revisiónsprotokollunum fyri Lønjavningargrunnin verður øll árini viðmerkt, at Løujavningargrunnurin fær allar útreiðslur sínar endurgoldnar úr landskassanum, men skal sambært skrivi landsstýrisins frá 21. august 1970 ikki mótrokna rentuinntøkurnar, soleiðis at grunnurin á hvørjum ári kemur at hava ein vinning svarandi til rentuinntøkurnar.

Á landsstýrisfundi 23. juli 1970 varð samtykt, at frá og við fíggjarárinum 1969/70 og fyri fyrst, verða rentuinntøkur grunsins ikki at taka við, tá ið millumrokningin viðv. studningsskipanini og minstulønini verður gjørd upp.

Útistandandi viðvíkjandi forskotsskipanini hevur, vísandi til ársroknskapirnar, í meðal árliga ligið um einar 22 mió.kr., og rentuinntøkurnar av forskotsskipanini hava sostatt neyvan rokkið til at renta hesa pengabinding.

Vísandi til § 8, 2. stk., í lógini, meta løgtingsgrannskoðararnir tað vera ivasamt, um lógarheimild er til, at landskassin hevur borið alla rentu og umsitingarútreiðslurnar av forskotsskipanini, og hevur latið grunninum bruttorentuinntøkurnar av forskotsskipanini sum eitt yvirskot, sum eginogn grunsins árliga er økt við.

Løgtingsgrannskoðararnir hava biðið landsstýrið um eina frágreiðing hesum viðvíkjandi, og um eina meting av, hvønn juridiskan status Lønjavningargrunnurin hevur, og hvør hevur ognarrættin til ognir/eginogn grunsins. Í sambandi við avtøku av Ráfiskagrunninum var »avlopið« 24 mió.kr. og eginognin uppá 3.7 mió.kr., sambært avgerð landsstýrisins, flutt til eginognina hjá Lønjavningargrunninum. Løgtingsgrannskoðararnir hava biðið landsstýrið um nærri grundgeving fyri hesum.

2. Keyp av bygningi

Lønjavningargrunnurin hevur saman við tveimum øðrum grunnum keypt og umbygt ein bygning fyri góðar 60 mió.kr. Parturin hjá Lønjavningargrunninum er ein triðingur, góðar 20 mió.kr.

Burtursæð frá rentum av láni í bygninginum, upprunaliga 6 mió.kr., hevur keypið higartil ikki beinleiðis ávirkað rakstrarúrslitið, við tað at keypið og umbyggingarnar eru aktiveraðar uttan at ávskrivingar yvir raksturin eru gjørdar. Men keypið og umbyggingarnar hava ávirkað gjaldføri grunsins.

Løgtingsgrannskoðararnir ivast í, um Lønjavningargrunnurin (við landsstýrisins góðkenning) kann disponera yvir játtanum til fiskivinnuna til annað enn lógásettar útgjaldingar ella onnur fyriskipað endamál, og um ikki løgtingið eigur at taka støðu til eina tílíka fløgu/lántøku, og løgtingsgrannskoðararnir hava biðið landsstýrið um eina frágreiðing hesum viðvíkjandi.

3. Serligir grunnar

Sambært ársroknskapin fyri 1991 standa uml. 30 mió.kr. eftir í teimum serligu grunnunum. Løgtingsgrannskoðararnir hava spurt um, hvørjar ætlanir landsstýrið hevur hesum viðvíkjandi.

8. *Seinasta álit frá løgtingsgrannskoðarunum:*

Í seinasta áliti frá løgtingsgrannskoðarunum dagfest 15. oktober 1986 viðvíkjandi roknskapunum fyri árini 1983/84-1985 varð átalað, at likviditetsstýringin millum Lønjavningargrunnin og landskassan var so vánalig, at grunnurin hesi árini hevði havt stórar rentuútreiðslur.

Løgtingsgrannskoðararnir heittu á løgtingið um at áleggja landsstýrinum at fáa hesi viðurskifti í rættlag.

Løgtingsgrannskoðararnir gjørdu vart við, at minstiforvinningurin, útgoldin til útróður, var skjótt vaksandi, og at upplýst var fyri nevndini, at spurnartekin kundi setast við, um hesin forvinningur virkaði sum ætlað í lógini. Løgtingsgrannskoðararnir meintu, at lógin átti at verið endurskoðað, soleiðis at reglurnar gjørdust greiðari.

Viðvíkjandi Ráfiskagrunninum hildu løgtingsgrannskoðararnir tað vera óheppið, at í tíðarskeiðinum hevði verið ein vøkstur, bæði í skuld til virkir og í tí, sum grunnurin átti útistandandi hjá virkjum, men at teir høvdu fingið vissu fyri, at arbeitt varð við at fáa hetta í rættlag.

9. *Roknskapargrannskoðarin/viðmerkingar:*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapirnar og grannskoðanarprotokollirnar til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga.

Lønjavningargrunnurin:

Viðvíkjandi útgjaldi av minstavinningi ger grannskoðarin øll árini 1987 til 1991 vart við, at sambært sátumála millum Meginfelag Útróðrarmanna og Skipa- og Bátaeigarar, verður

frádrigið fyri agn og egning av bruttoveiðuni. Hesar útreiðslur verða ikki skjalprógvaðar.

Grannskoðarin hevur samstundis lagt til merkis, at lutfalsliga stórur munur er á hvussu nógv teir einstøku bátarnir draga frá fyri hvønn húkin, og mælir hann tí til, at fastar reglur verða gjørdar fyri, hvussu nógv hesin frádráttur kann verða.

Árini 1988 til 1990 ger grannskoðarin vart við, at ongar nágreiniligar reglur eru fyri, hvat teir ymsu serligu grunnarnir kunnu nýtast til, og mælir til, at greiðari reglur verða settar. Sum er, er tað landsstýrið sum ger av, hvussu nýtslan skal verða, meðan luturin hjá Lønjavningargrunninum er at útgjalda ávísingar landsstýrisins

Ráfiskagrunnurin:

Grannskoðarin hevur ongar viðmerkingar til roknskapir grunsins fyri tíðarskeiðið.

10. Keyp av bygningi

Í 1986 keyptu teir tríggir grunnarnir, Húsaláns-, Menningar- og Lønjavningargrunnurin, bygningin teir nú halda til í við Hoyvíksvegin. Keypsprísurin var 13,5 mió.kr.

Frá 1987 til og við 1990 vórðu gjørdar ábøtur á bygningin uppá 46,9 mió.kr. Parturin hjá Lønjavningargrunninum í bygninginum er ein triðingur. Í roknskapinum fyri 1991 er bygningurin tikin upp við 20 mió.kr.

Sambært uppgerðini í roknskapinum tey fyrstu árini var skuldin í bygninginum uml. 17,5 mió.kr., og parturin hjá Lønjavningargrunninum 1/3 av hesari upphædd, umleið 6 mió.kr.

Í roknskapinum fyri 1991 ger grannskoðarin vart við, at tað ikki ber til, at gera upp hvussu stór nettoskuldin er, tí ongin rakstrarroknskapur er gjørdur fyri bygningin. Orsøkin til hetta er, at grunnarnir ikki eru samdir um, hvussu roknskapurin skal gerast.

Bygningurin hevur sostatt higartil kostað grunninum góðar 20 mió.kr. Av hesum eru sambært roknskapinum uml. 6 mió.kr. fíggjaðar við lántøku.

11. Viðvíkjandi útgjaldingum úr teim serligu grunnunum í Lønjavningargrunninum

Umframt lógarbundnu útreiðslunar eru um Lønjavningargrunnin í tíðarskeiðinum 1986 til 1990 útgoldnar góðar 80 mió.kr. úr serligum grunnum:

		Mió.kr.
Serligi grunnur I:	Serligur grunnur til fiskivinnuna, mest til at stuðla veiðu, sum ikki hevur verið munandi táttur í samfelagnum higartil, men kann gerast til tað	36,0
Serligi grunnur II:	Grunnur til fígging av fiskiskapsroyndum á fremmandum høvum	5,5

Serligi grunnur III:	Eftirlit við royndum eftir svartkjafti	0,3
Serligi grunnur IIII:	Serligur grunnur til fiskivinnuna	38,4
		80,2

Skrivligu boðini til Lønjavningargrunnin um útgjaldingar úr teim serligu grunnunum eru í flestu førum samtyktar á landsstýrisfundum, í nøkrum førum eru boðini frá landsstýrismanni ella løgmanni, og í ávísum førum frá fiskivinnuumsitingini eftir tilmæli frá fiskirannsóknarstovuni. Í flestu førum eru útgjaldingarnar ikki lagdar fyri fíggjarnevndina til góðkenningar.

Ad. Serligi grunnur I.

Avsetingar í grunnin.

Fyrstu ferð peningur varð tilskilaður til nýtslu úr serliga grunni I, var í viðmerkingunum til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna fyri 1982/83, har tað sambært løgtingstíðindi í 1981 í sundurgreiningini av ætlaða samlaða stuðlinum til fiskivinnuna uppá 203 mió.kr., eru avsettar 10 mió.kr. til serliga grunnin til fiskivinnuna, mest til at stuðla veiðu, sum ikki hevur verið munandi táttur í samfelagnum higartil, men kann gerast til tað.

Í álitinum frá meirilutanum í fíggjarnevndini verður tingið kunnað um, at tað eru landsstýrið og fíggjarnevndin saman, ið taka avgerð um hvussu hesin peningur verður nýttur.

Avsetingarnar til grunnin uppá falt 20 mió.kr. í tíðarskeiðinum 1982/83-1984/85 verða tilskilaðar í teim árligu uppskotunum um broyting í løgtingslóg um stuðul til fiskivinnuna.

Í sambandi við lógarbroytingarnar galdandi fyri 1985 verður hetda mannagongd broytt, og tað verður boðað frá, at studningur til manning og rakstur verður latin sum ein rammuupphædd, og vil landsstýrið framyvir í sambandi við framløguna av løgtingsfíggjarlógini geva eina frágreiðing um, hvussu komið er fram til hesa upphædd. Í 1987 vórðu avsettar 3 mió.kr. í grunnin.

Umframt omanfyrinevndu avsetingarnar í grunnin samtykti fíggjarnevndin 10. november 1987 at játta í mesta lagi 15 mió.kr. til grunnin til partvísa royndarveiðu eftir svartkjafti við Andriasi í Hvannasundi og Polarfarinum í einum 6 mánaða skeiði.

Harumframt játtaði fíggjarnevndin eina umbøn frá landsstýrinum um eykajáttan til góðskueftirlit við svartkjaftaroyndum uppá 1,5 mió.kr., sum varð skrásett í serliga grunni III. Av landskassaroknskapinum fyri 1987 framganga hesar 16,5 mió.kr. á § 16 sum »serlig veiting til fiskivinnuna«.

Útgjaldingar úr grunninum 36,0 mió.kr.

Tær størstu útgjaldingar úr grunninum 1986-1989 vóru hesar:

	Mió.kr.
Vegna Andrias í Hvannasundi:	
- Lán	1,0
- Studningur	1,0

- Rakstur/royndarveiða	16.8	18.8
Vegna Polarfarið		
- Rakstur/royndarveiða		11,6
Magnus Heinason, surimiverksmiðja		4,1
Annað		1,5
		36.0

Í sambandi við royndarveiðuna við Andriasi í Hvannasundi og Polarfarinum komu 4,5 mió.kr. inn í grunnin fyri sølu í royndartíðarskeiðinum.

Í skrivi til Lønjavningargrunnin 14. apríl 1988 boðar landsstýrið frá, at til heimild er útvegað til at gjalda meirnýtsluna fyri royndir við svartkjaftaskipum, verður heimilað Lønjavningargrunninum at yvirtrekkja játtanina til royndir viðvíkjandi svartkjafti, so tað, sum mest leikar á, kann verða goldið. Í sambandi við, at landsstýrið í mai 1988 svaraði einum fyrispurningi um royndarveiðuna, varð løgtingið kunnað um fíggjarliga úrslitið og at peningur mátti útvegast. Á fundi 28. oktober 1988 samtykti landsstýrið at rinda meirnýtsluna t.kr. 7.255 úr grunninum til serligar fiskivinnukanningar.

Viðvíkjandi Andrias í Hvannasundi metti landsstýrisins eftirlitsmaður, at reglugerðin um at peningur fyri vøru, ið reiðarfið selur, skal inn á serliga konto, ið landsstýrið ávísir, ikki var hildin. Landsstýrið gjørdi ikki meira við málið.

Í 1990 og 1991 er einki útgoldið úr grunninum.

Ad. Serligi grunnur II.

Avsetingar í grunnin.

Í viðmerkingunum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna varð sambært løgtingstíðindi 1980 í sundurgreiningini av ætlaða stuðlinum til fiskivinnuna fyri 1981/82 uppá t.kr. 205.850 avsettar 5 mió.kr. at fara í grunn til fígging av fiskiskapsroyndum í fremmandum høvum.

Á henda hátt varð peningur játtaður fram til 84/85. Síðani er ongin peningur avsettur til »serliga grunn II«.

Útgjaldingar úr grunninum 5.5 mió.kr.

Tær størstu útgjaldingarnar úr grunninum í tíðarskeiðinum 1986-1988 vóru hesar:

	Mió.kr.
Borðoyarnes - fiskiroyndir í Barentshavinum	2,0
Hans Erik - fiskiroyndir í Barentshavinum	1,0
Hvítiklettur, tunfiskaroyndir	0,9
Skálafjall, royndir eftir kongafiski	0,5
Borgarin, kalvaroyndir	0,4
Føroya Reiðarafelag, kanningarferð til Argentina	0,5
Annað	0,2
	5,5

Í tíðarskeiðinum 1989-1991 er einki útgoldið úr grunninum.

Ad. Serligi grunnur III.

Avsetingar í grunnin.

Játtanin til »serliga grunn III« stavar frá 1987, tá figgjarnevndin samtykti eina umbøn frá landsstýrinum um eykajáttan til góðskueftirlit við svartkjaftaroyndum uppá 1,5 mió.kr.

Útgjaldingar úr grunninum 0,3 mió.kr.

Í 1987 og 1988 vórðu útgoldnar 0,3 mió.kr. til góðskueftirlit og restupphæddin 1,2 mió.kr. varð í 1988 flutt til serliga grunn I.

Ad. Serligi grunnur IIII. (frá 1990 nr. III)

Avsetingar í grunnin.

Árini 1988, 1989 og 1990 vórðu avsettar 25 mió.kr. árliga í grunnin, alt 75 mió.kr. Í 1991 varð einki avsett.

Útgjaldingar úr grunninum 38,4 mió.kr.

Tær størstu útgjaldingar úr grunninum 1988-1990 vóru hesar:

	Mió.kr.	Mió.kr.
Mest tunfiskaroyndir:		
- Julius á Bakka	1,9	
- Hvítiklettur	1,1	
- P/F Osberg & Johansen	1,2	
- Klettur	1,I	
- P/F Trolfisk	2,6	
- Trol- og Snørisvirkið	1,3	9,2
Skálafjall, rakstrarstudningur, serligur kilostudningur, ymsar royndir		5,4
Tróndur í Gøtu, lán/stuðul		6,2
Sjúrður Tollaksson, rakstrarstudningur/sildastuðul		1,3
Hans Erik, fiskiskap Flemish Cap		1,8
Sigurfari, fiskiskap Flemish Cap		1,8
Fame, studningur og stuðul		5,1
Andrias í Hvannasundi, sjópantikrøv		1,2
Gullfinnur, lán, rokning, prísískoyti		1,6
Menningarstovan		0,6
Lodnustudningur, sildastudn., serlig prísískoyti, góðskumeting, kanningarferðir, laksaroyndir v.m.		4,2
		38,4

Uppá fyrispurning er upplýst, at Lønjavningargrunnurin ikki í øllum førum hevur fingið nærri boð um at skráseta lán veitt úr grunninum.

Sum nevnt, samtykti landsstýrið í 1988 at flyta 7.255 mió.kr. úr hesum grunni til serliga grunn I til tess at »rinda« meirýtslu í sambandi við royndarveiðu eftir svartkjafti við Andrias í Hvannasundi og Polarfarinum.

Í 1991 er einki goldið úr hesum grunninum.

- - - - -

Á landsstýrisfundi tann 2. januar 1990 samtykti landsstýrið at góðkenna uppskot til reglugerð fyri serliga grunnin til fiskivinnuna við ymsum broytingum. Ein »góðkend reglugerð fyri serliga grunnin til fiskivinnuna« er undirskrivað av landsstýrismanninum í fiskivinnumálum 3. august 1990. Síðani er at kalla einki útgoldið úr serligu grunnunum.

12. *Aðrar viðmerkingar:*

Vísandi til omanfyristandandi viðmerkingar hava løgtingsgrannskoðararnir biðið landsstýrið um frágreiðingar um ávís viðurskifti, og verður løgtingið seinni kunnað um hesar.

Ásannast má, at milliardstuðulin úr Lønjavningar- og Ráfiskagrunninum hesi árini, sæð út frá einum heildarsjónarmiði, ikki hevur verið samfelagnum til gagns í tann mun, ætlanin var við hesum lógum, serliga tá hugsað verður um tær stóru upphæddirnar, sum eisini eru útgoldnar í stuðli, lánum og veðhaldsútleggum vegna bygging og umbygging av skipum og fiskavirkjum, íløgur sum í stóran mun eru grundaðar á støðugt útgoldnan prísmun úr Ráfiskagrunninum.

Átalað verður, at 80 mió.kr. eru goldnar úr teim serligu grunnunum í Lønjavningargrunninum uttan at nærri reglur vórðu ásettar og kunngjørdar hesum viðvíkjandi. Løgtingsgrannskoðararnir meta tað vera skeivt, at hesir grunnar meira enn helvtin minni í loyndum eru nýttir til lán, alskyns stuðul/royndir og serligar studningsskipanir v.m., samstundis sum kunngjørdar lógir og kunngerðir um studningsskipanir og aðrir almennir grunnar/stovnar eru, ið ætlaðir eru til tílík endamál. Nógvur peningur er nýttur til royndarfiskiskap o.l., mett verður, at hetta átti at verið betri fyrireikað, fyriskipað og samskipað m.a. við tí fyri eyga at skráseta úrslitini á ein skipaðan hátt.

Mett verður, at játtanarviðurskiftini á fiskivinnuøkinum hava verið sera ógreið, og at umsitingin og skrásetingin av teim ymsu útreiðslunum, m.a. orsakað av hesum, ikki hevur verið nøktandi, og sum heild er tað tí torført at gera metingar av, um játtaði peningurin er nýttur á besta hátt og til ætlaða endamálið.

1. viðgerð 28. februar 1994. Samtykt at beina málið beinleiðis til 2. viðgerð.

2. viðgerð 3. mars 1994. Málið samtykt við 21-0 atkvøðum.

47 Grannskoðan av almennum roknskapum
2. Sjúkrahúsverk Føroya fyri Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús

Ár 1994, fríggjadagin 18. februar løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

Álit

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Sjúkrahúsverki Føroya fyri Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús fyri fíggjarárini 1986-1991

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lógargrundarlag:

Lógargrundarlagið undir tí føroyska sjúkrahúsverkinum er »lov nr. 621 af 22. december 1976 for Færøerne om sygehusevæsenet«, seinni broytt við lóg nr. 542 frá 1. november 1978 og lóg nr. 720 frá 18. november 1987.

Við heimild í § 3, 2. stk., í lógini hevur landsstýrið í reglugerð nr. 70 frá 6. oktober 1977 við broytingum frá 27. august 1980 og 25. august 1983 fyrisett nærri reglur fyri Sjúkrahúsverk Føroya.

Ovasti myndugleikin fyri Sjúkrahúsverki Føroya, sum sambært sjúkrahúslógina eru tey trý sjúkrahúsini (Landssjúkrahúsið í Tórshavn, Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús), eru sjúkrahússtýrini.

Sambært lógina tekur ein ráðleggingarnevnd sær av ætlanum um útbygging av tí samlaða sjúkrahúsverkinum.

Í sjúkrahúslógini er ásett, at sjúkrahússtjórin hevur ta dagligu umsitingarligu leiðsluna av sjúkrahúsverkinum, samstundis sum hesin er skrivari fyri tey trý sjúkrahússtýrini og fyri ráðleggingarnevndina. Sambært reglugerðina skal sjúkrahússtjórin vera sjúkrahússtýrunum til handa í leiðsluni av sjúkrahúsverkinum, og er yvirfyri sjúkrahússtýrunum ansvarligur fyri tí gjøllari fyrisitingini av sjúkrahúsverkinum eftir tí stevnu, sum stýrini gera av, og annars samsvarandi ta av landsstýrinum góðkendu starvslýsing fyri stjóran.

Umsjónarmenninir røkja, undir ábyrgd sjúkrahússtjórans, tað dagligu fyrisitingarligu leiðsluna av sjúkrahúsunum, og hava ábyrgdina av roknskaparførsluni og at tann góðkenda fíggjarætlanin verður hildin.

2. *Endamál:*

Sjúkrahúslógin sigur onki um, hvat endamálið er við Sjúkrahúsverki Føroya. Í skrivi dagfest 28. mei 1990 hevur landsstýrið ásett eina »yvirordnaða« arbeiðsætlan til tess at tryggja rationellan rakstur av sjúkrahúsverkinum.

Í stuttum kann sigast, at høvuðsuppgávurnar hjá sjúkrahúsunum er kanning, viðgerð og røkt av sjúklingum.

Sjúkrahúsverkið verður ottast lýst sum eitt lið í tí samlaða heilsu- »verkinum«, har tað annars finnast nógvir »sjálvstøðugir« stovnar/øki, t.d. kommunulæknar, heimasjúkrasystrar, tannlæknar, ljósmøðraskipanin o.o., fyribyrgjandi heilsuskipanir við t.d. skúlalækna og barnatannrøkt.

3. *Fíggjarviðurskifti:*

Helmingurin av útreiðslunum til sjúkrahúsverkið varð endurgoldið av danska ríkinum fram til 1. januar 1988, tá blokkstuðulsskipanin kom í gildi.

Í reglugerð landsstýrisins fyri sjúkrahúsverkið er ásett, at grundað á innkomin uppskot frá teimum einstøku sjúkrahússtýrunum, ger og sendir sjúkrahússtjórin landsstýrinum uppskot til fíggjarætlan fyri samlaða sjúkrahúsverkið. Møgulig umbøn um eykajáttan verður av sjúkrahússtjóranum at leggja fyri fíggjarnevndina við tilmæli frá sjúkrahússtýrunum.

Sjúkrahússtýrini senda árligu roknskapirnar til sjúkrahússtjóran. Roknskapirnir verða eftirkannaðir av sjúkrahússtjóranum, grannskoðaðir av statsgóðkendum grannskoðara og góðkendir eftir reglunum fyri almennar roknskapir.

4. *Yvirlit yvir rakstrarútreiðslur 1986-1991:*

Til tess at kunna løgtingið um gongdina í bruttoútreiðslunum, er gjørdur ein samandráttur úr roknskapunum fyri tey trý sjúkrahúsini fyri árini 1986-1991:

(mió.kr.)

	1986	1987	1988	1989	1990	1991
Lønir:						
Landssjúkrahúsið	136.2	153.3	160.0	180.8	171.2	173.8
Klaksvíkar Sjúkrahús	22.5	25.3	28.9	30.5	29.9	29.9
Suðuroyar Sjúkrahús	13.9	14.7	15.8	17.4	17.2	18.1
	172.6	193.3	204.7	228.7	218.3	221.8
Aðrar útreiðslur:						
Landssjúkrahúsið	52.2	66.0	74.9	71.6	45.8	46.8
Klaksvíkar Sjúkrahús	12.6	12.2	15.1	15.3	11.1	11.3
Suðuroyar Sjúkrahús	5.6	7.0	8.1	11.5	6.3	5.7
	70.4	85.2	98.1	98.4	63.2	63.8

Bruttoútreiðslur ialt:						
Landssjúkrahúsið	188.4	219.3	234.9	252.4	217.0	220.6
Klaksvíkar Sjúkrahús	35.1	37.5	44.0	45.8	41.0	41.2
Suðuroyar Sjúkrahús	19.5	21.7	23.9	28.9	23.5	23.8
	243.0	278.5	302.8	327.1	281.5	285.6

5. *Játtanarviðurskifti viðvíkjandi rakstrarútreiðslum:*

Tey einstøku sjúkrahúsini hava ávísar inntøkur, her er serliga talan um húsaleigu. Landssjúkrahúsið hevur harumframt síðani 1990 havt eina munandi inntøku frá uppihaldsgjaldi, sum frá 1989 til 1990 vaks úr 0.3 til 5.3 mió. kr..

Niðanfyristandandi er víst eitt yvirlit yvir nettoútreiðsluna hjá teim einstøku sjúkrahúsunum í tíðarskeiðnum 1986-1991, og eru hesar samanbornar við tað, ið játtað varð í fíggjarløgtingslógini tey einstøku árini.

Landssjúkrahúsið	1986	1987	1988	1989	1990	1991
Bruttoútreiðslur	188.4	219.3	234.9	252.4	217.0	220.6
Inntøkur	÷3.7	÷3.6	÷3.4	÷3.8	÷9.4	÷9.1
Nettoútreiðslur	184.7	215.7	231.5	248.6	207.6	211.5
Ríkisstudningur	÷105.2	÷118.0	0.0	0.0	0.0	0.0
Játtan á fíggjarlóg	÷80.1	÷93.4	÷238.9	÷244.2	÷207.3	207.5
Meir-/minninýtsla	0.6	÷4.3	7.4	÷4.4	÷0.3	÷4.0
Klaksvíkar Sjúkrahús						
Bruttoútreiðslur	35.1	37.5	44.0	45.8	41.0	41.2
Inntøkur	÷0.3	÷0.5	÷0.3	÷0.3	÷0.2	÷0.3
Nettoútreiðslur	34.8	37.0	43.7	45.5	40.8	40.9
Ríkisstudningur	÷17.4	÷18.5	0.0	0.0	0.0	0.0
Játtan á fíggjarlóg	÷17.9	÷17.5	÷43.2	÷44.8	÷39.4	÷39.5
Meir-/minninýtsla	0.5	÷1.0	÷0.5	÷0.7	÷1.4	÷1.4
Suðuroyar Sjúkrahús						
Bruttoútreiðslur	19.5	21.7	23.9	28.9	23.5	23.8
Inntøkur	÷0.1	÷0.1	÷0.2	÷0.2	÷0.2	0.0
Nettoútreiðslur	19.4	21.6	23.7	28.7	23.3	23.8
Ríkisstudningur	÷9.7	÷10.2	0.0	0.0	0.0	0.0
Játtan á fíggjarlóg	÷9.1	÷10.1	÷23.5	÷27.1	÷23.3	÷23.3
Meir-/minninýtsla	÷0.6	÷1.3	÷0.2	÷1.6	0.0	÷0.5

Av omanfyristandandi sæst, at øll trý sjúkrahúsini tey seinastu trý árini hava havt eina meirnýtslu í mun til játtanina á fíggjarlógini uppá góðar 14 mió. kr íalt.

Meirnýtslan á Suðuroyar Sjúkrahúsið hevur tó verið 1,1 mió. kr. størri enn roknskapirnir vísa. Víst verður til viðmerkingar roknskapargrannskoðarans hesum viðvíkjandi.

6. *Íløgur*

Umframt rakstrarútreiðslur er talan um íløgur, sum ikki framganga av roknskapinum fyri tey einstøku sjúkrahúsini:

	1987	1988	1989	1990	1991	Ialt
Játtan	**6.7**	**16.0**	**25.0**	**18.0**	**13.6**	**79.3**
Íløgur:						
Suðuroyar Sjúkrahús		3.0	14.0	9.5	9.0	35.5
Klaksvíkar Sjúkrahús	5.3	8.6	11.8		1.2	26.9
Landssjúkrahúsið		0.8	16.2	7.8	2.9	27.7
Landslæknahúsini	—	—	—	—	0.4	0.4
Íløgur ialt	5.3	12.3	42.0	17.3	13.5	90.4
Munur	1.4	3.7	÷17.0	0.7	0.1	÷11.1

Omanfyrinevndu íløgur eru síðani 1988 játtaðar til og bókaðar í grunninum til sjúkrahúsbygging, sum framgongur av landskassaroknskapinum.

Tær størstu íløgurnar eru gjørdar á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Sambært byggiroknskapin fyri Suðuroyar Sjúkrahús 1988-1992, dagfestur 13. oktober 1993, vórðu útgoldnar góðar 20 mió.kr. í 1992, so samlaða íløgan ultimo 1992 var uml. 55,5 mió.kr.

Av byggiroknskapinum framgongur, at uml. 84 mió.kr. eru játtaðar til 1. byggistig, sum ætlandi verður liðugt í 1994. Annað byggistig er mett at kosta 20 mió.kr., og verður væntandi liðugt eitt ár aftaná 1. byggistig.

7. *Seinasta álit frá løgtingsgrannskoðarunum:*

Í seinasta áliti frá løgtingsgrannskoðarunum dagfest 6. november 1987 viðvíkjandi roknskapunum fyri tey trý sjúkrahúsini fyri fíggjarárini 1983/84-85, gjørdu løgtingsgrannskoðararnir vart við og átalaðu ávís viðurskifti:

1. Fíggjarlóg/eykajáttan

Løgtingsgrannskoðararnir gjørdu vart við at um so var, at sjúkrahúsini ikki kundu halda seg innanfyri játtanina á fíggjarlógini, skuldi umbøn um eykajáttan leggjast fyri Fíggjarnevndina í sjálvum fíggjarárinum.

2. Myndugleikabýti

Vegna tess at ógreiða hevði verið um myndugleikabýtið ímillum sjúkrahússtjóran/umsjónarmannin og formannin í einum sjúkrahússtýri, bóðu løgtingsgrannskoðararnir

skrivstovustjóran í landsstýrinum um eitt responsum viðvíkjandi myndugleikabýtinum í fyrisitingini av sjúkrahúsverkinum, og varð í álitinum sagt greitt frá niðurstøðuni hesum viðvíkjandi.

3. Ráðgeving og eftirlit í byggimálum

Vísandi til, at sjúkrahúsverkið hevur nýtt donsk arkitektvirki í byggimálum v.m., mettu løgtingsgrannskoðararnir, at tíðin var komin til at taka støðu til, um ikki føroysk arkitekt- og verkfrøðingavirki kundu taka sær av hesum spurningum.

4. Ortopedkirurgisk skurðstova á Klaksvíkar Sjúkrahúsi

Løgtingsgrannskoðararnir átalaðu, at stýrið fyri Klaksvíkar Sjúkrahús hevði biðið arkitektin um at gera nýtt uppskot viðvíkjandi ortopedkirurgiskari skurðstovu, sum víkti nógv frá tí, ið samtykt var á fíggjarlógini, og átalað varð, at hetta ikki varð lagt fyri ráðleggingarnevndina.

5. Privatpraksis hjá yvirlæknum

Vísandi til at grannskoðarin hevði gjørt vart við, at reglurnar fyri leigu av facilitetum hjá sjúkrahúsunum vóru sera ymiskar, ógreiðar og tilvildarligar, heittu løgtingsgrannskoðararnir á sjúkrahússtjóran um at fáa hesi viðurskifti í rættlag á øllum sjúkrahúsunum.

Í skrivi dagfest 19. mei 1992 hevur sjúkrahússtjórin gjørt eina generella reglugerð um privata viðtalu hjá yvirlæknum. Henda fekk gildi frá 1. september 1992.

8. *Roknskapargrannskoðanin/viðmerkingar:*

Løgtingsgsrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapirnar og grannskoðanarprotokollirnar til tess at vissa seg um, at alt er farið rætt fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá sjúkrahúsunum.

Viðvíkjandi **Landssjúkrahúsinum** ger grannskoðarin øll árini vart við, at hann síðani 1984/85 hevur víst á, at tað eftir hansara metan er neyðugt, at spurningurin um gjald fyri nýtslu av hølum, starvsfólki, laboratorium v.m. til privatpraksis hjá yvirlæknunum kemur í rætta og fasta legu sum skjótast. Mælt verður til at økja um trygdina viðvíkjandi lønarumsiting. Eftirlitið við ognarlutum sjúkrahúsverksins verður ikki mett at vera nóg gott, og mælt verður til at gera anlægskartotek á øllum trimum sjúkrahúsunum.

Bruna- og vatnskaða tryggingarvirði av føstum ognum við innbúgvi hjá landssjúkrahúsinum var ultimo 1991 útvið 600 mió.kr. Grannskoðarin ger vart, við at upplýst er, at tryggingarnar viðvíkjandi landssjúkrahúsinum eru uppsagdar í juni 1992, og at ognirnar v.m. sostatt frá 1. apríl 1993 ikki eru tryggjaðar.

20. august 1993 varð ein nýggj, broytt tryggingaravtala gjørd, ið er munandi bíligari.

Viðvíkjandi **Suðuroyar Sjúkrahúsi** grannskoðarin ger vart við, at røntgentól fyri 3,8 mió.kr., ið vórðu keypt og goldin í 1989, eru útreiðsluførd við 2 mió.kr. í 1989 og 700 túsund kr. í 1990. Restupphæddin, 1,1 mió.kr., varð flutt fram til 1991 men ikki útreiðsluførd, og tí flutt fram til 1992, tá restupphæddin varð útreiðsluførd.

Sjúkrahúsognin v.m. er í Suðuroy tryggjað fyri umleið 46 mió.kr.

Viðvíkjandi **Klaksvíkar Sjúkrahúsi** upplýsir grannskoðarin, at hann eftir áheitan frá sjúkrahússtjóranum m.a. hevur kannað og staðfest, at Klaksvíkar Sjúkrahús fær ongar inntøkur fyri serlæknapraksis hjá tveimum yvirlæknum.

Sjúkrahúsognin v.m. í Klaksvík er tryggjað fyri ialt uml. 56 mió.kr.

9. *Kanningar og tilmæli viðvíkjandi Sjúkrahúsverki Føroya:*

Ráðleggingarnevndin fyri Sjúkrahúsverk Føroya heitti á vári 1987 á Dansk Sygehus Institut um at gera eina kanning av ymsum viðurskiftum innan Sjúkrahúsverk Føroya, m.a. til tess at finna fram til, hvar í Føroyum tað var mest hóskandi við ortopedkirurgiskari viðgerð.

Frágreiðingin var liðug í mars mánaði 1988. Í frágreiðingini verður m.a. nomið við tey tilmæli og tey uppskot, ið ráðleggingarnevndin sjálv í áliti sínum frá 1980 hevði mælt til. Víst verður á, at á týðandi økjum hevur tíðin síðani 1980 vist, at gongdin hevur verið beint mótsatt av tí, ið ráðleggingarnevndin hevði lagt upp til.

Víst verður eisini á, at gongdin innan sjúkrahúsverkið hevur verið nógv merkt at spurningunum um sentralisering ella desentralisering, og at hetta stríð í stóran mun er politiskt, og í ein ávísan mun gróðursett í lógini um Sjúkrahúsverk Føroya, hóast lógin hinvegin við sjúkrahússtjóraembætinum og ráðleggingarnevndini leggur upp til at fáa sjúkrahúsverkið at virka sum eina eind.

Í niðurstøðuni verður m.a. mælt til eitt heilsustýri fyri alt heilsuverkið byrjandi við sjúkrahúsverkinum, kommunulæknum og serlæknum. Mælt verður til at staðfesta, at landssjúkrahúsið skal vera sentralsjúkrahús fyri allar Føroyar, og at hini sjúkrahúsin: fyrst og fremst skulu taka sær av bráneyðugari medisinskari viðgerð, almennari kirurgi, burðarhjálp og eftirviðgerð.

Víst verður eisini á manglandi hagtalsgrundarlag fyri figgjarstýring innan alt heilsuverkið, og mælt verður til at høta munandi um hesi viðurskifti, byrjandi við at uppbyggja eina hagtalsskipan fyri hvørja viðgerð fyri hvønn sjúkling sær.

Viðvíkjandi ortopedkirurgiskari viðgerð varð víst á ymsar møguleikar, og tilmæli vórðu eisini gjørd fyri aðrari serviðgerð viðvíkjandi minking av nýtslu av seingjardøgum og viðvíkjandi læknastarvssetanum.

- - - - -

Ráðleggingarnevndin hevur enn ikki endaliga viðgjørt DSI-frágreiðingina, ið biðið varð um í 1987, og hevur sostatt ikki tikið støðu til tær niðurstøður og tey tilmæli, ið gjørd vóru.

- - - - -

Á heysti 1992 boðaði landsstýrið frá, at settur fór at verða ein arbeiðsbólkur, har donsku heilsumyndugleikarnir vóru við, til tess at gera eina kanning av heilsuverkinum í Føroyum, tess skipan og uppgávubýti. Frágreiðingin er liðug, og verður nú nærri viðgjørd.

1. viðgerð 23. februar 1994. Samtykt at beina málið beinleiðis til aðru viðgerð.

2. viðgerð 4. mars 1994. Málið samtykt við 24-0 atkvøðum.

47 Grannskoðan av almennum roknskapum 3. Húsalánsgrunnurin

Ár 1994, fríggjadagin 18. februar løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

Álit

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Húsalánsgrunninum fyri fíggjarárini 1986-1992 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lógargrundarlag:

Húsalánsgrunnurin er undir eftirliti landsstýrisins og virkar eftir:

Løgtingslóg nr. 97 frá 1. november 1978
Løgtingslóg nr. 65 frá 11. mai 1982 (broyting)
Løgtingslóg nr. 44 frá 2. mai 1986 (broyting)
Løgtingslóg nr. 32 frá 7. mai 1991 (broyting)
Kunngerð nr. 68 frá 26. juni 1991

2. *Endamál:*

Lógaruppskot um húsalánsgrunn varð lagt fyri tingið fyrstu ferð í 1951. Í 1964 varð málið aftur lagt fyri løgtingið, og varð lógin um Húsalánsgrunnin samtykt. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið varð nevnt, at løgtingið hevur havt til viðgerðar 3 ymisk uppskot, sum miðaðu ímóti at lætta fólki um húsalánsviðurskiftini.

Í viðmerkingunum varð sagt, »at soleiðis sum samfelagsviðurskiftini í Føroyum eru, er tað vorðið tyngri at seta búgv, og má tað haldast at vera ein samfelagslig uppgáva at lætta fólki um búrcisingina. Ein táttur í hesum er at veita sethúsabyggingini lagaiig stovnslán«.

Í 1978 var ein lógarbroyting har millum annað afturgjaldingin av lánunum skuldi laga seg eftir inntøkuni hjá lántakaranum, og miðað skuldi verða í móti, at lántakarin ikki skal nýta meira enn 20% av síni inntøku tilsamans, at gjalda rentur og avdrátt av lánum við, men hotta varð avtikið við lóg frá 1982.

Húsalánsgrunnurin hevur, sambært løgtingslóg nr. 97 frá 1. november 1978 um Húsalánsgrunn, við seinni broytingum, til endamáls: at veita lán til sethúsa- og íbúðabygging og keyp.

Húsalánsgrunnurin kann sambært §7 veita hesi lán:

1. Stuttfreistað lán til keyp av grundstykki.
2. Byggilán til bygging av nýggjum sethúsum og íbúðum, avmarkað til ta upphædd, ið grunnurin veitir sum veðskuldarlán.
3. Veðskuldarlán til nýggj sethús og íbúðir.
4. Veðskuldarlán til keyp av sethúsum eila íbúðum.
5. Veðskuldarlán til endurnýggingar, umbyggingar og bjálving av sethúsum og íbúðum.

Lániumsóknir skulu vera skrivligar, og við umsóknini skulu fylgja húsateking, kostnaðarætlan, og eisini skal tilskilast, um lánið ynskist sum annuitetslán ella seriulán.

3. *Fíggjarviðurskifti:*

Inntøkumar hjá Húsalánsgrunninum eru rentuinntøkur av veittum lánum, og 2% av lánsupphæddini við hvørja lántøku fara í tiltaksgrunn. Ikki er heimilað at nýta tiltaksgrunnin til útlán, men skal hann standa í virðisskjølum sambært reglunum fyri ognir ómyndinga.

Játtanin til Húsalánsgrunnin verður veitt av § 19, almenn forsorg, ymiskir studningar.

Niðanfyri er sett upp hvussu nógv er játtað á fíggjarløgtingslógini og hvussu nógv er útgoldið av lánum í tíðarskeiðinum 1986 - 1992:

(mió. kr.)

	1986	1987	1988	1989	1990	1991	1992	Alt
Játtað á fíggjarløgtingslóg	14	15	27	40	32	0	5	133
Útgoldið av lánum	47	73	110	97	97	131	119	674

4. *Ársroknskapur:*

Ársroknskapurin skal verða grannskoðaður av løggildum grannskoðara. Ársroknskapurin verður sendur landsstýrinum við frágreiðing og viðmerkingum frá stýrinum. Ársroknskapurin verður lagdur fyri løgtingið til góðkenningar.

Landskassin veðheldur, pr. 31.12.92, fyri 219,5 mió.kr..

Avskrivað uppá skuldarar í 1992 er 6 mió.kr. og 135 mió.kr. eru burturlagdar móti tapi uppá skuldarar.

Í 1992 er avskrivað 1,2 mió.kr. uppá bygning v.m. Harumframt er felagsognin niðurskrivað við 8 mió.kr.

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina, er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapunum:

5. *Yfirlit yfir gengdina í rakstrinum 1986 - 1992:*

(milljónir)	1986	1987	1988	1989	1990	1991	1992
Tekjur							
Rentur af lánum	25.6	29.5	33.7	42.7	49.8	57.8	68.8
Aðrar rentutekjur	1.4	1.2	1.4	1.5	2.0	0.5	1.6
Kursvinningur af virðisbrevum	0.1	0.1	0.1	0.1	0.1	0.1	0.1
Virðismeting og inngjesing	-	-	-	-	-	0.7	0.6
Stovningarprovision	0.9	1.5	2.2	2.0	1.9	2.6	2.4
	28.0	32.3	39.4	46.3	53.8	57.7	73.5
Rentuutreiðslur av lanum	19.0	22.2	26.6	31.3	37.3	50.0	56.4
	9.0	10.1	12.8	15.0	16.5	17.7	17.1
Útreiðslur							
Lonir	-	-	-	-	-	3.9	4.0
Rakstrarutreiðslur	2.1	2.1	2.5	2.9	4.7	2.2	2.4
Avskrivingar av bygningi v.m.	0.1	0.1	0.4	0.2	0.2	1.5	1.2
Avskriving av skuldarum	0.0	0.0	0.0	0.0	0.0	2.6	6.0
	2.2	2.2	2.9	3.1	4.9	10.2	13.6
	1.2	1.8	1.8	1.9	0.6	0.9	0.8
Asamnað kurstap	-	-	-	-	-	-	8.0
Niðurskriving av felagsogninni	0.0	0.0	0.0	0.0	4.0	6.0	135.0
Avsett mott tapi av skuldarum	3.4	4.6	4.7	5.0	5.5	17.1	157.4
Rakstrarurslit	5.6	6.1	8.1	10.0	11.0	1.6	-140.3

Yfirlit yfir gengdina í figgjarstoðuni 1986 - 1992

(mió.kr.)	1986	1987	1988	1989	1990	1991	1992
Aktiv							
Tokur peningur	24.4	0.0	0.4	5.4	103.8	3.1	30.7
Skuldarar	0.6	0.0	0.1	0.3	0.9	0.2	0.0
Fermunsettirstoður	2.1	2.1	3.1	5.5	7.3	10.8	13.2
Veðbrev	339.4	391.0	497.0	581.1	657.9	761.8	716.0
Fastogn	-	-	-	-	-	-	13.2
Rakstrargogn	0.8	0.7	0.5	1.6	0.8	1.8	1.3
Innskot i felagsogninni	7.2	7.6	11.1	17.6	19.0	21.3	12.6
Bundin peningur samb. §4	4.6	4.3	10.9	11.3	15.1	16.6	16.8
Aktiv i alt	379.1	415.7	523.1	622.2	804.8	815.6	803.8
Passiv							
Bankaskuld	0.0	13.2	9.8	9.5	0.0	2.7	0.0
Ognarar	0.2	0.0	0.0	0.2	0.3	0.4	0.1
Lán	209.4	216.7	288.8	316.8	485.5	476.0	594.1
Lán vegna Felagsogninni	2.8	0.0	0.0	5.6	0.0	3.6	3.5
Lán vegna fastogn	-	-	-	-	-	-	13.2
Skyldugar rentur og avdráttir	0.0	0.0	3.8	14.6	0.5	13.3	4.0
	212.4	229.9	302.4	346.7	486.3	496.0	614.9
Eginogn:							
Stovnsgrunnur	131.4	146.4	173.4	213.4	245.4	245.4	250.4
Tiltaksgrunnur samb. § 4	8.0	9.5	11.7	13.7	15.6	18.2	20.6
Tiltaksgrunnur II	35.7	40.0	46.0	53.9	62.9	60.9	-81.8
Ikki asannaður kursmunur	-8.4	-10.1	-10.4	-5.5	-5.4	-4.9	-0.3
	166.7	185.8	220.7	275.5	318.5	319.6	188.9
Passiv i alt	379.1	415.7	523.1	622.2	804.8	815.6	803.8

Í roknskapinum er ein nýggjur postur uppá 13.2 mió.kr. settur í aktiv. sum verður nevndur *fastogn*, og tilsvarandi postur er í passiv, *lán vegna fastogn*, uppá somu upphædd. Hetta eru hús sum húsalánsgrunnurin hevur keypt á tvingsilssølu. Grunnurin átti við ársenda 1992 25 hús.

Ársfrágreiðing

Í ársfrágreiðingini fyri 1992 verður nærri upplýst um ávís viðurskifti:

Innkomnar umsóknir vóru 606 og veitt lán vóru í alt 768. Í árinum eru 457 lán fult afturgoldin.

Grunnurin fekk 5 mió.kr. í stuðli úr landskassanum. Stovnsgrunnurin er nú komin upp í 250 mió.kr. Húsalánsgrunnurin hevur í 1992 tikið upp 2 lán uttanlands uppá falt 154 mió.kr.

Lóg nr. 181 frá 18. desember 1992 um endurrindan av meirvirðisgjaldi fyri sethúsabygging er sett í gildi 1. januar 1993, og skal Húsalánsgrunnurin umsita lógina.

Sum støðan er í landinum, verður hildið, at tað búskaparliga ikki er rætt at fíggja meira nýbygging sum er.

Rentustøðið var 9.75% og 11.0% p.a. og afturgjaldingartíðin á lánum til nýggj sethús/íbúðir, sum eru játtað aftaná september 1992, varð stytt ávikavist úr 28 árum til 20 ár, og úr 20 árum til 15 ár.

Orsakað av teim stóru burturleggingunum í 1992 uppá 143 mió.kr. minkaði eginognin munandi. Hetta merkti, at eginognin fór úr 38% niður í 26% av allari útlánsmongdini. Eginognin batnar tó aftur í 1993, við tað at skuldin til Oljugrunnin 55.75 mió.kr., sambært løgtingslóg nr. 59 frá 26. mars 1993, verður strikað. Eginognin verður tá 34% av útlánsmongdini.

6. *<u>Grunnar við tilknýti til Húsalánsgrunnin:</u>*

Grunnar sum hava tilknýti til Húsalánsgrunnin eru Bjálvingarstuðulsgrunnurin og Íbúðagrunnurin.

Bjálvingarstuðulsgrunnurin: Bjálvingarstuðulsgrunnurin er settur á stovn við lóg nr. 87 frá 1. juni 1982. Galdandi lóg er lóg nr. 40 frá 7. mai 1991. Endamálið er at veita lagalig lán til bjálving av sethúsum hjá pensjónistum sum búgva í egnum húsum. Hesi lán eru avdráttar- og rentufrí.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður nevnt, at útreiðslurnar til upphiting av sethúsum eru vorðnar ein støðugt vaksandi byrða í tí dagliga húsarhaldinum. Hesar útreiðslur eru serliga nívandi hjá fólki, sum einans hava fólka- og avlamispensión at liva av og sum sita við eldri húsum.

Bjálvingarstuðulsgrunnurin fær eina árliga játtan á fíggjarløgtingslógini. Stovnspeningurin pr. 31. desember 1990 er 25.2 mió.kr. Grunnurin hevur eina millumrokning tilgóðar hjá lands-

kassanum uppá 2 mió.kr. Innistandandi í banka er 14.7 mió.kr. og veðskuldarbrøv eru 13 mió.kr.

Íbúðagrunnurin: Íbúðagrunnurin er settur á stovn við lóg nr. 100 frá 1. desember 1978. við seinni broytingum. Galdandi lóg er nr. 52 frá 7. mai 1987. Endamálið hjá íbúðagrunninum er at fremja og stuðla kommunum, feløgum og stovnum at útvega og reka íbúðahús. Grunnurin veitir lán til íbúðafeløg og íbúðastovnar, sum sambært hesi lóg eru góðkend til at fáa fígging úr grunninum. Íbúðagrunnurin er ein sjálvsognarstovnur.

Til keyp ella bygging av íbúðahúsum lænir grunnurin 18% og felagið/stovnurin útvegar 18% av virðinum sum eginpening. Tey fyrstu 5 árini verður lánið úr íbúðagrunninum og eginpeningurin ikki roknaður uppí, tá leiguupphæddin verður ásett. Lánið og eginpeningurin verða síðani rindað aftur við 1/40 parti um árið og við rentu, ið svarar til 10% av tí til eina og hvørja tíð galdandi útlánsrentu hjá Húsalánsgrunninum.

Grunnurin hevur veitt lán uppá í alt 7,8 mió.kr. og rentuinntøkan av hesum var í 1991 66 t.kr., og svarar hetta til eina rentu uppá umleið 0.8%.

Við løgtingslóg nr. 33 frá 27. mars 1992 varð grunnurin avtikin og sambært §1 hevur landskassin yvirtikið tær skyldur, ið hava áligið grunninum.

7. *Seinasta álit frá løgtingsgrannskoðarunum:*

Í seinasta áliti frá løgtingsgrannskoðarunum, dagf. 15. oktober 1986, viðvíkjandi roknskapinum fyri 1985, varð staðfest, at trygd var fingin fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfar hjá grunnunum er kannað og at roknskapargrannskoðanin hevur fingið vissu fyri, at roknskapir og tann fíggjarliga støðan hjá øllum grunnunum er í lagi.

8. *Roknskapargrannskoðarin/viðmerkingar:*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapirnar og grannskoðanarprotokollirnar, til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá grunninum.

Grannskoðarin hevur ikki gjørt vart við serlig átaluverd viðurskifti.

9. *Viðmerkingar*

1. Íbúðagrunnurin varð avtikin sambært løgtingslóg nr. 33, frá 27. mars 1992 um avtøku av landskassagrunnum. Men løgtingslóg nr. 52, frá 7. mai 1987 um Íbúðagrunn, har m.a. ásett er, at Íbúðagrunnurin er sjálvsognarstovnur, er ikki avtikin. Heitt verður tí á landsstýrið um at greiða hesa spurning.

2. Mælt verður til neyðugt eftirlit við og viðlíkahald av fastognum, ið Húsalánsgrunnurin yvirtekur.

1. viðgerð 22. februar 1994. Samtykt at beina málið beinleiðis til 2. viðgerð.

2. viðgerð 4. mars 1994. Málið samtykt við 22-0 atkvøðum.

47 Grannskoðan av almennum roknskapum 4. Menningargrunnur Ídnaðarins 1992

Ár 1994, fríggjadagin 15. apríl løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

Álit

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Menningargrunni Ídnaðarins fyri fíggjarárið 1992 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lógargrundarlag:

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 37 frá 26. juni 1973 um menningargrunn fyri ídnað, handverk og tænastufyritøkur, við seinni broytingum.

Við heimild í § 7 í lógini hevur landsstýrið, seinast í kunngerð nr. 17 frá 31. mars 1989 um viðtøkur fyri Menningargrunn Ídnaðarins, fyrisett nærri reglur fyri virksemi grunsins.

2. Endamál:

Tað gongur fram av áliti ídnaðarnevndarinnar til upprunaliga lógaruppskotið, at ætlanin við stovnsetanini var at menna ídnað, handverk og tænastufyritøkur í Føroyum við beinleiðis fíggjarligum studningi, ella við lánsveiting o.t. »har aðrir lánistovnar ongan stuðul veita«.

Lógin heimilar grunninum at veita:

- uppbyggingar-/útflutningskreditt og -veðhald
- rentustudning
- studning til vørumenning og gransking v.m.
- hjálp til mennan á serligum støðum
- lán og/ella studning til fíggjan og rakstur av nýstovnaðum virkjum og umskipan av verandi.

Sambært viðtøkum grunsins, eigur nevndin at býta veitingar úr grunninum best møguligt millum ymiskar vinnugreinir, og harumframt at hava í huga nøgva samvinnu við landsstýrið og ymsar stovnar, til tess at samskipa heildarveitingarnar best møguligt. Viðtøkurnar áseta ávís hámørk fyri tær einstøku veitingarnar í mun til (fløgu)útreiðslurnar, og at øll lán uppá meira enn 2 mió.kr. og veðhald størri enn 3 mió.kr. krevja góðkenning frá landsstýrinum. Somuleiðis krevur studningsveiting uppá meira enn 500 t.kr. og fløgustudningur uppá meira enn 400 t.kr. góðkenning frá landsstýrinum. Í viðtøkunum eru ásettar ávísar reglur um m.a. at fløgulán ikki mugu fara uppum 90% av fløguútreiðslunum.

3. *Fíggjarviðurskifti:*

Sambært § 2 í viðtøkunum, er fíggjarliga støðið undir grunninum:

a) játtan á fíggjarlógini,
b) lántøka við landskassaveðhaldi,
c) rentuinntøkur,
d) endurgoldin givin lán,
e) 1 °/₀₀ gjaldið sambært lógarinnar § 4,
f) aðrar inntøkur.

4. *Yvirlit yvir rakstur 1989-1992:*

	1992	1991	1990	1989
Inntøkur:				
Studningur úr landskassanum	12	15	18	20
Rentuinntøkur	23	36	39	31
	35	51	57	51
Útreiðslur:				
Rakstrarútreiðslur	4	5	2	2
Studningur	0	÷1	÷1	3
Rentuútreiðslur	21	25	25	18
Burturleggingar og avskrivingar av lánum	91	165	47	14
Avskrivingar av bygningi	12	1	-	-
	128	195	73	37
Úrslit	÷93	÷144	÷16	+14
Eykajáttan	63	-	-	-
	÷30	÷144	÷16	+14

5. *Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1989-1992:*

Aktiv	1992	1991	1990	1989
Útlán	114	251	296	331
Avsett móti tapi	÷79	÷111	÷0	÷0
	35	140	296	331
Innistandandi í peningastovnum	92	54	26	33
Skrivstovubygningur	9	20	20	19
Aðrir bygningar	-	9	7	0
Skuldarar v.m.	-	-	30	12
Aktiv samanlagt	136	223	379	395
Passiv				
Skuld:				
Uttanlandslán	176	194	188	200
Íløgugrunnurin	0	25	35	35
Oljugrunnurin	0	17	19	19
Íleggingargrunnurin fyri Føroyar	2	3	3	3
Onnur lán v.m.	10	11	17	5
	188	250	262	262
Eginogn, íroknað kursmun	÷52	÷27	117	133
Passiv samanlagt	136	223	379	395

6. *Seinasta álit frá løgtingsgrannskoðarunum:*

Í seinasta áliti frá løgtingsgrannskoðarunum dagfest 26. februar 1992 varð m.a. víst á, at grunnurin í tíðarskeiðinum 1986-1991 hevur mist umleið 225 mió.kr. sum avsetingar/tap uppá skuldarar.

Løgtingsgrannskoðararnir mettu, at fleiri avskrivingar og avsetingar áttu at verið gjørdar áðrenn 1990, um so var, at sami metingar- og roknskaparháttur sum í 1991 varð nýttur.

Samanumtikið høvdu løgtingsgrannskoðararnir hesar viðmerkingar:

1. Í § 4 í lógini er ásett, at ein av fíggingarkeldum grunsins skuldi vera eitt gjald uppá 1 °/oo av árliga umsetninginum hjá øllum iðnaðarvirkjum, handverkara- og tænastufyritøkum. Av praktiskum grundum hevur landsstýrið mett, at gjaldið ikki skuldi innkrevjast.

   Lógin og reglugerðin er tó ongantíð broytt hesum viðvíkjandi.

   Løgtingsgrannskoðararnir átalaðu, at hetta ikki var gjørt, og mæltu til, at álagt verður landsstýrinum at kanna hesi viðurskifti aftur.

2. Løgtingsgrannskoðararnir átalaðu, at mannagongdin í sambandi við viðgerð av umsóknum, innanvirkis eftirlit, debitorrøkt, risikometing v.m. ikki hevði verið nóg væl skipað.

3. Løgtingsgrannskoðararnir heittu á landsstýrið um at geva eina frágreiðing um, hvussu keyp, umbygging og fígging av bygninginum - uppá falt uml. 60 mió.kr. - har grunnurin eigur 1/3, er farin fram. Parturin hjá Menningargrunninum er í 1992 niðurskrivaður við 12 mió.kr.

4. Løgtingsgrannskoðararnir mettu, at punkt 8.1 og 8.2. í kunngerðini, har ásett er at býta veitingarnar best møguligt ímillum ymsar vinnugreinir í nevvari samvinnu við landsstýrið, ikki hevði virkað nóg væl, m.a. við tað at avgerðargrundarlagið ikki hevur verið nóg gott.

5. Løgtingsgrannskoðararnir mettu, at virksemið hjá Menningargrunninum og samvinnan við Føroya Ídnaðargrunn, Búskaparráðið, Menningarstovuna og landsstýrið til tess at tryggja ein skynsaman og samskipaðan stuðuls- og útlánspolitikk til frama fyri menning og umskiping av ídnaði, handverks- og tænastufyritøkum ikki hevði verið nóg væl skipað øll árini.

6. Løgtingsgrannskoðararnir mæltu til, at lóg/viðtøkur verða broyttar, so at nærri krøv til viðgerð av umsóknum, innanvirkis eftirlit, debitorrøkt, risikometing v.m. verða ásett.

7. Løgtingsgrannskoðararnir mæltu landsstýrinum til at áseta nærri krøv til uppsetan av roknskapi v.m. fyri tílíkar stovnar/grunnar.

   Løgtingsgrannskoðararnir hava í skrivum til landsstýrið biðið um eina frágreiðing viðvíkjandi omanfyrinevndu viðurskiftum, sum umrødd vórðu í seinasta áliti, men hava ikki fingið svar enn.

7. *Roknskapargrannskoðanin/viðmerkingar:*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapin og grannskoðanarprotokollina til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

Í grannskoðaraátekningini verður víst á, at eginpeningurin er negativur við 52 mió.kr., og skal Menningargrunnur Ídnaðarins halda fram, er neyðugt at grunnurin fær pening tilførdan fyri at yvirhalda treytirnar hjá lánsveitarunum.

Í grannskoðanarprotokollini verður greitt frá, at tær stóru avsetingarnar ímóti tapi í roknskapinum fyri 1991 viðførdu, at eginpeningurin bleiv negativur við 26,9 mió.kr., og varð trupulleikin tá loystur við at Føroya Løgting samtykti at veita eina eykajáttan uppá ialt 62,5 mió.kr. í stuðli fyri at rætta eginpeningin uppaftur. Tað bleiv gjørt á tann hátt, at lán frá Íløgugrunninum uppá 24,5 mió.kr. og lán frá Oljugrunninum uppá 16,5 mió.kr. vórðu eftirgivin, og restin 21,5 mió.kr. bleiv sett inn á bundnar konti í peningastovnunum. Eftir hetta varð eginpeningurin so positivur við 35,6 mió.kr. Men tá grunnurin fyri 1992 hevur eitt hall uppá 93,1 mió.kr. verður eginpeningurin incl. kursmun av valutalánum aftur negativur við 52,3 mió.kr.

Viðvíkjandi skrivstovubygninginum við Hoyvíksvegin, sum Menningargrunnurin eigur ein triðing av, verður upplýst, at hesin er niðurskrivaður úr 20 mió.kr. til 8 mió.kr. Upplýst verður, at tað framvegis ikki er semja um, hvussu raksturin av bygninginum skal býtast, av tí at allir eigararnir ikki nýta líka stóran part av hesum, og er ongin loysn funnin enn. Mælt verður tí aftur til at greiða fæst á, hvussu hetta mál kann loysast.

(Upplýst er, at hesin spurningur síðani er loystur, og at Menningargrunsins partur av húsaútreiðslunum viðvíkjandi tíðarskeiðinum 1986-1992 er 3,3 mió.kr, netto, og at henda upphædd verður útreiðsluførd í 1993-roknskapinum.)

8. *Viðmerkingar:*

Í juni 1993 samtykti løgtingið lógaruppskot landsstýrisins um endurstovnan av eginpeningi Menningargrunni Ídnaðarins við 65 mió.kr., vísandi til, at um eginpeningur grunsins er negativur, falla lán grunsins til gjaldingar.

Samstundis samtykti løgtingið uppskot til samtyktar um at heita á landsstýrið um at taka spurningin um samanlegging av Føroya Ídnaðargrunni, Menningargrunni Ídnaðarins og nøguliga grunninum til ídnaðarfremjandi endamál og gistingarhúsgrunninum til viðgerðar.

Løgtingsgrannskoðarunum kunnugt er hesin spurningur ikki liðugt viðgjørdur.

Vísandi til fíggjarligu støðuna hevur grunnurin onki útlánsvirksemi havt seinastu árini, og heitt verður á landsstýrið um at gera eina meting av, í hvønn mun tað er skilagott at grunnurin nú hevur umf. 150 mió.kr. innistandandi í peningastovnum við lítlum ella negativum rentumarginali í mun til rentuútreiðslurnar, og hví hesin peningur ikki heilt ella partvíst verður nýttur til at afturgjalda lán.

1. viðgerð 21. apríl 1994. Samtykt at beina málið beinleiðis til 2. viðgerð.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Málið samtykt við 28-0 atkvøðum.

47 Grannskoðan av almennum roknskapum
5. Føroya Ídnaðargrunnur 1992

Ár 1994, fríggjadagin 15. apríl løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

Álit

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Føroya Ídnaðargrunni fyri fíggjarárið 1992 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lógargrundarlag:

Føroya Ídnaðargrunnur varð settur á stovn við løgtingslóg nr. 68 frá 24. september 1970. Viðtøkurnar fyri grunnin vórðu ásettar av landsstýrinum við kunngerð nr. 7 frá 28. apríl 1971.

2. Endamál:

Endamálið við grunninum er at veita lán til íløgur í ídnaðar- og handilsfyritøkur við tí í hyggju at stuðla umskipan til broytt marknaðarviðurskifti.

Av viðmerkingunum sæst, at orsøkin upprunaliga var handilsligu viðurskifti Føroya við EFTA.

Ásettar eru fleiri reglur, ið hava til endamáls at tryggja, at ansað verður eftir, at tapini verða so lítil sum gjørligt.

T.d. verður ásett í § 7: »at lánið ikki má vera hægri enn neiðiligt og neyðugt er eftir eini meting av møguleikunum hjá virkinum at bera seg og lívføri tess«, og í § 11 í kunngerðini verður ásett, at virkir, sum fáa lán, koma undir »roknskaparligt og tekniskt eftirlit«.

Lógin, reglugerðin og viðmerkingarnar leggja soleiðis upp til ein varnan og tryggan útlánspolitikk, soleiðis at vandin fyri tapi av høvuðsstólinum verður so lítil sum gjørligt.

3. Fíggjarviðurskifti:

Grunnurin fekk upprunaliga eitt stovnsfæ uppá 4.5 mió.kr., og heimild at taka lán upp til 20

mió.kr. Landsstýrið hevur við kunngerðum hækkað hetta loft stigvíst til 300 mió.kr., til loftið varð avtikið í 1989, sama ár sum ein lóg varð samtykt, ið heimilaði landsstýrinum at veðhalda upp til 40 mió.kr.

Burtursæð frá stovnsfænum hevur grunnurin ikki beinleiðis fingið játtað pening á fíggjarlógini fyrr enn í 1993.

Grunnurin hevur fingið »almenn« lán úr:
- fløgugrunni Ídnaðarins
- fleggingargrunninum fyri Føroyar
- Oljugrunninum.

Hesi lán vóru 31.12.1992 falt uml. 142 mió.kr.

Harumframt hevur grunnurin uttanlandslán uppá uml. 79 mió.kr., sum landskassin veðheldur fyri.

4. *Yvirlit yvir rakstur 1989-1992:*

Til tess at kunna løgtingið um gongdina í útreiðslunum, er gjørdur ein samandráttur úr roknskapunum fyri árini 1989-1992:

	1992	1991	1990	1989
Rentuinntøkur	26	29	29	28
Útreiðslur:				
Rentuútreiðslur	19	19	20	18
Aðrar útreiðslur	3	4	5	3
Tap uppá skuldarar	21	8	6	2
	43	31	31	23
Ársúrslit samb. roknskap	÷17	÷2	÷2	+5
Avsett ímóti tapi	÷24	÷17	÷15	÷3
Úrslit aftaná avsetingar	÷41	÷19	÷17	÷2

5. *Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1989-1992:*

Aktiv:				
Útlán	183	222	237	243
Avsett móti tapi	÷64	÷40	÷23	÷8
	119	182	214	235
Innistandandi í peningastovnum	58	53	34	49
Yvirtiknar ognir	11	7	4	5
Skrivstovubygningur	11	11	12	14
Aktiv samanlagt	199	253	264	303

Passiv:				
Lán	223	*236*	*228*	*251*
Eginogn	÷24	*17*	*36*	*52*
Passiv samanlagt	199	*253*	*264*	*303*

6. *Roknskapargrannskoðanin/viðmerkingar:*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapin og grannskoðanarprotokollina til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá grunninum.

Í grannskoðanarátekningini verður mett, at avsetingar ímóti tapi uppá skuldarar bert eru nóg stórar, um tað eydnast at venda búskaparligu gongdini í Føroyum.

Í grannskoðanarprotokollini verður kunnað um, at løgtingið við lóg í juni 1993 eftirgav restskuldina av lánum úr Oljugrunninum (15 mió.kr.) og heimilaði landsstýrinum at seta nýggjan eginpening, 15 mió.kr. í Føroya Ídnaðargrunn, og at eginpeningurin sostatt í mun til støðuna við árslok 1992 gjørdist positivur við 6,5 mió.kr.

Viðvíkjandi lánum úr Fløgugrunni Ídnaðarins (24,4 mió.kr.) hevur landsstýrið játtað Ídnaðargrunninum avdráttarskáa.

Viðvíkjandi lánum úr Íleggingargrunninum fyri Føroyar (102,6 mió.kr.) verður upplýst, at Ídnaðargrunnurin ikki hevur goldið falnar avdráttir, og at stýrið fyri Íleggingargrunnin hevur játtað Ídnaðargrunninum avdráttarskáa fyri teir avdráttir, sum ikki eru goldnir í 1991 og 1992.

7. *Viðmerkingar:*

Samstundis sum løgtingið í juni 1993 samtykti lóg um eftirgeving av skuld og endurstovnan av eginpeningi Føroya Ídnaðargruns, samtykti løgtingið uppskot til samtyktar um at heita á landsstýrið um at taka spurningin um samanlegging av Føroya Ídnaðargrunni, Menningargrunni Ídnaðarins og møguliga grunninum til ídnaðarfremjandi endamál og gistingarhúsgrunninum til viðgerðar.

Løgtingsgrannskoðarunum kunnugt er hesin spurningur ikki liðugt viðgjørdur.

Vísandi til fíggjarligu støðuna, hevur grunnurin so at siga onki útlánsvirksemi havt seinastu árini, og verður heitt á landsstýrið um at gera eina meting av, í hvønn mun tað er skilagott at uppsamla stórt gjaldføri í grunninum við kapitalinnskoti, eftirgeving av skuld og avdráttarskáa, m.a. vísandi til, at rentumarginalur grunsins gerst minni og minni.

1. viðgerð 21. apríl 1994. Samtykt at beina málið beinleiðis til 2. viðgerð.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Málið samtykt við 28-0.

47 Grannskoðan av almennum roknskapum
6. Apoteksverk Føroya 1992

Ár 1994, fríggjadagin 15. apríl løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

Álit

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Apoteksverki Føroya fyri fíggjarárið 1992 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lógargrundarlag:

Apoteksverk Føroya er stovnur undir Føroya landsstýri og virkar eftir

- lóg nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið og heilivág, sum broytt við lóg nr. 54 frá 8. mei 1991.
- kunngerð nr. 82 frá 11. august 1989 um heilivágsskrá
- kunngerð nr. 84 frá 11. august 1989 um dygd í heilivági
- kunngerð nr. 8 frá 8. mars 1991 um fyrimyndarreglur á heilivági
- kunngerð nr. 69 frá 26. juni 1991 um skrásetingarráð viðvíkjandi farmaseutiskum tilbúningi.

2. Endamál:

Vísst verður til frásøgn hesum viðvíkjandi í síðsta áliti.

3. Fíggjarviðurskifti:

Sambært § 6 í lógini um apoteksverkið og heilivág, setir landsstýrið ein apotekara á hvørjum apotiki. Sambært § 8 skipar apotekarin fyri rakstrinum av apotekinum og hevur ábyrgd av, at virkið verður útint forsvarliga og samsvarandi galdandi ásetanum og givnum fyriskipanum.

Landsstýrið ásetur, sambært § 9, reglur um virksemi hjá teim ymsu apotekseindunum og kann áseta reglur um rakstur teirra.

Sambært § 18 í lógini ásetur landsstýrið reglur fyri útroknan av søluprísi til brúkaran hjá

apotekum. handkeypssølum. læknum og djóralæknum. á vørum sum eru tilskilaðar apotekum at selja.

Sambært § 22 eru Apoteksgrunnurin. landsapotekarin og apotekini ein búskaparlig eind. tó at tey hava hvør sín roknskap.

Fíggjarætlanaruppskot og gjaldsuppskot fyri apoteksverkið verða viðgjørd av landsapotekaranum og apotekarunum í felag. og verða við fylgisviðmerkingum teirra send landsstýrinum.

Fíggjarætlanaruppskotið verður sent landsstýrinum á hvørjum ári í seinasta lagi til ta tíð. landsstýrið hevur ásett.

Apoteksgrunnurin eigur sambært § 23 vørugoymslurnar. innbúgvi og føstu ognirnar hjá apoteksverkinum. Grunnurin er undir landsstýrinum og hevur til endamáls at fíggja apoteksverkið. og avlopið frá apotekstakstrinum fellur til apoteksgrunnin.

Sambært § 24 er landsstýrinum heimilað. vegna apoteksgrunnin. at taka tey lán. sum vørukeyp fastognarkeyp. bygging og umbygging til hvørja tíð krevja.

- - - - -

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina. er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapunum fyri 1989-1992:

4. *Yvirlit yvir rakstur 1989-1992:*

(mió.kr.)

Inntøkur:	1992	1991	1990	1989
Søla - kontant	23,6	22.2	19,8	18.6
Søla - kredit	86,7	75,9	58,5	58,7
Avsláttur	-2,5	-3,0	-1,8	0,0
Søla ialt	107,8	95,1	76,5	77,3
Vørunýtsla	72,8	61,3	46,1	47,4
Bruttovinningur	35,0	33,8	30,4	29,9
Bruttovinningur í %	32,5%	35,5%	39,8%	38,7%
Lønir	15,3	14,8	14,5	13,3
Rakstur av fastari ogn	1,5	2,2	1,4	1,6
Kostnaður	5,0	4,9	4,1	3,0
Landsapotekarin	0,9	1,0	0,9	0,7
Útreiðslur ialt	22,7	22,9	20,9	18,6
Úrslit áðrenn rentur	12,3	10,9	9,5	11,3
Rentur	0,3	0,1	0,1	0,1

Úrslit áðrenn avskrivingar	12.6	*10,8*	*9,4*	*11,2*
Avskrivingar	3,0	*3,0*	*2,5*	*1,9*
Ársúrslit	9,6	*7,8*	*6,9*	*9,35*

5. Yvirlit yvir gongd í figgjarstøðuni 1989-1992:

(mió.kr.)

Aktiv:	1992	*1991*	*1990*	*1989*
Kassa-, banka- og giropeningur	26,1	*23,6*	*17,6*	*16,9*
Debitorar	12,2	*11,8*	*10,5*	*8,7*
Vørugoymsla	15,2	*13,4*	*12,6*	*10,6*
Innbúgv	2,6	*1,6*	*1,6*	*2,5*
Bílar	0,1	*0,1*	*0,1*	*0,1*
Fastar ognir	10,0	*9,7*	*9,9*	*8,5*
Aktiv ialt	66,2	*60,2*	*52,3*	*47,3*
Passiv:				
Kreditorar	14,2	*13,6*	*10,1*	*9,5*
Millumrokning við apoteksgrunnin:				
Saldo primo	46,6	*42,2*	*37,8*	*30,3*
Rentur til grunnin	1,8	*1,6*	*1,5*	*1,2*
	48,4	*43,8*	*39,3*	*31,5*
Ársúrslit	9,6	*7,8*	*6,9*	*9,3*
	58,0	*51,6*	*46,2*	*40,8*
Inngoldið í Apoteksgrunnin	6,0	*5,0*	*4,0*	*3,0*
Saldo ultimo	52,0	*46,6*	*42,2*	*37,8*
Passiv ialt	66,2	*60,2*	*52,3*	*47,3*

6. *Íløguvirksemi árini 1989-1992:*

Í tíðarskeiðinum 1989 til 1992 eru gjørdar íløgur í bilar, innbúgv (serliga ETV) og bygningar. Hesar íløgur eru býttar soleiðis:

(Í 1.000 kr.)

	1992	1991	1990	1989
Innbúgv	3.743	2.781	1.460	1.149
Bilar	219	0	0	147
Føst ogn	510	106	1.611	390
Ialt	4.472	2.887	3.071	1.686

7. *Apoteksgrunnurin:*

Í § 23 í løgtingslóg um apoteksverk og heilivág er apoteksgrunnurin undir landsstýrinum og hevur til endamáts at fíggja apoteksverkið. Apoteksgrunnurin eigur ognirnar hjá apoteksverkinum, og avlopið hjá apoteksverkinum fellur til grunnin.

Fíggjarstøðan hjá Apoteksgrunninum ultimo 1992 var henda:

(1.000 kr.)	
Nettoognir apoteksverksins	52.068
Innistandandi í peningastovnum	16.473
	68.541

Av nettoognum apoteksverksins stóðu 26.2 mió.kr. í peningastovnum, so samanlagt hevði apoteksverkið eina uppsamlaða peningaupphædd uppá 42.7 mió.kr. ultimo 1992.

8. *Seinasta álit frá løgtingsgrannskoðarunum:*

Í seinasta áliti frá løgtingsgrannskoðarunum dagfest 22. mars 1993 viðvíkjandi roknskapunum hjá apoteksverkinum fyri árini 1987-1991 varð mælt landsstýrinum til at taka støðu til, nær nóg mikið av peningi er uppsamlaður í Apoteksgrunninum og hvat ætlanin er, at hesin peningur skal brúkast til, og somuleiðis verður mælt til at áseta hvussu stórt samlað árligt nettoúrslit apoteksverkið framyvir skal miða ímóti, og at renturokningin til Apoteksgrunniu verður endurskoðað.

Í skrivi dagfest 20. januar 1994 frá Føroya Landsstýri verður boðað frá, at landsstýrið er av teirri áskoðan, at ikki er neyðugt at uppsamla meira pening í Apoteksgrunnin, tí apoteksverkið nú er ført fyri at fíggja sítt egna virksemi.

Landsstýrið tekur undir við Ráðleggingarnevndini, sum mælir til, at peningurin, ið er uppsamlaður, skilabest kann nýtast til:

1. At styrkja/tryggja fíggjarligu støðu apoteksverksins móti møguligum framtíðar rakstrar- og fíggjarligum bakkøstum.
2. At nýta tað góða gjaldførið/fíggjarligu støðuna til, í samráðingum við vørukreditorar, at fáa munandi avslættir til bata fyri rakstrargrundarlag apoteksverksins framyvir.

Á henda hátt er møguleiki fyri at nýta part av batnaða rakstrargrundarlagnum saman við ígongdverandi rationalisering, at lækka prisin á heilivági.

Boðað verður frá, at landsstýrið er sinnað framhaldandi av sínum eintingum at fremja tiltøk til lækking av søluprísum á heilivági. Landsstýrið vil taka útgangsstøði í tilmæli frá Ráðleggingarnevndini um, hvussu stórt samlað yvirskot miðast skal ímóti í sambandi við komandi áseting av søluprísi á heilivági, og er landsapotekarin biðin um at gera ítøkiligt uppskot.

Landsstýrið tekur undir við at gera eina nýggja reglugerð fyri grunnin og at renturokningin til Apoteksgrunnin verður strikað, og at hesin peningur verður nýttur til at seta prísin á heilivági niður.

9. Roknskapargrannskoðarin/viðmerkingar:

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapin og grannskoðanarprotokollina, til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum. Roknskapargrannskoðarin hevur ikki gjørt vart við serlig viðurskifti.

10. Viðmerkingar:

Mett verður, at Apoteksverkið seinnu árini hevur havt ov stórt yvirskot og uppsamlað nógvan pening, og mælt verður tí til, at umhugsa at nýtt ein part av uppsamlaða peninginum til at lækka prísirnar.

1. viðgerð 21. apríl 1994. Samtykt at beina málið beinleiðis til 2. viðgerð.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Málið samtykt við 27-0 atkvøðum.

47 Grannskoðan av almennum roknskapum
7. Sjónvarp Føroya 1992

Ár 1994, týsdagin 22. februar løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

Álit

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Sjónvarpi Føroya fyri fíggjarárið 1992 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lógargrundarlag:

Tað almenna sjónvarpið varð sett á stovn sambært løgtingslóg nr. 77 frá 21. mei 1982.

Sambært § 6 í lógini var lóg nr. 11 frá 14. februar 1957 um útvarpsnevnd og reglugerðin um starv útvarpsnevndarinnar tilsvarandi at galda fyri sjónvarpsnevndina.

2. Endamál:

Sambært § 1 í lógini hevur løgtingið einkarrætt til sjónvarpssendingar og setir á stovn Sjónvarp Føroya.

Sjónvarp Føroya hevur til endamáls at hava objektivan, sakligan og upplýsandi tíðindaflutning og sendingar annars, ið varðveita og fjálga um føroyska mentan, átrúnað og siðalæru.

3. Fíggjarviðurskifti:

Eftir tilmæli frá sjónvarpsnevndini setir landsstýrið, sambært § 2 í lógini, í starv ella loysir úr starvi fyristøðumann, ið hevur dagligu leiðslu sjónvarpsins um hendi, eftir reglugerð ið landsstýrið fyrisetur.

Sambært § 4 skal til sjónvarpið rindast gjald at hvørjum sjónvarpsmóttakara í landinum og umborð í skipum, ið eru skrásett í Føroyum. Landsstýrið fyrisetur gjaldið fyri eitt ár í senn eftir tilráðing fíggjarnevndarinnar.

Sambært § 5 í lógini ger fyristøðumaðurin uppskot til góðkenningar til fíggjarætlan fyri

fíggjarárið og sendir landsstýrinum uppskotið. Inntøkur sjónvarpsins verða bert at nýta til sjónvarpsendamál.

- - - - -

Til tess at kunna um ta fíggjarligu gongdina hjá Sjónvarpi Føroya er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapunum fyri 1989-92:

4. *Yvirlit yvir rakstur 1989-1992:*

Inntøkur	1992	*1991*	*1990*	*1989*
Sjónvarpsgjald	12.636	*12.588*	*12.889*	*12.189*
Lýsingar	3.006	*2.207*	*1.291*	*447*
Sektarpeningur	259	*93*	*61*	*60*
Søla og leiga av sjónbondum	155	*226*	*160*	*168*
Inntøkur alt	16.056	*15.114*	*14.401*	*12.864*
Útreiðslur				
Sjónvarpsstøðirnar og studiið	2.130	*1.543*	*1.836*	*1.867*
Útreiðslur viðv. sendingum:				
lønir	7.394	*7.249*	*6.962*	*6.434*
samsýningar	1.019	*883*	*1.013*	*828*
annað	3.715	*2.752*	*2.487*	*2.741*
Stjórnarútreiðslur:				
lønir	2.005	*1.907*	*1.474*	*1.541*
annað	1.926	*2.088*	*2.880*	*2.635*
Sjónvarpsnevndin	59	*65*	*65*	*65*
Avskrivingar, útgerð o.t.	0	*469*	-	*219*
Avskr. og -setingar av eftirstøðum	1.400	*1.361*	*559*	*200*
Rentur	÷163	*60*	*÷17*	*÷32*
Útreiðslur alt	19.485	*18.377*	*17.259*	*16.498*
Rakstrarhall	3.429	*3.233*	*2.858*	*3.634*
Landskassastudningur	3.476	*3.500*	*3.000*	*4.800*
Samlað úrslit	47	*237*	*142*	*1.166*

5. *Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1989-1992:*

Aktiv	1992	*1991*	*1990*	*1989*
Innistandandi í peningastovnum	1.660	*232*	*61*	*198*
Skuldarar:				
eftirstøður f.sjónvarpsgjald	1.552	*3.892*	*5.502*	*4.341*
aðrir skuldarar	103	*59*	*31*	*369*
Umferðarfæ	3.315	*4.183*	*5.594*	*4.908*
Skitsa til sjónvarpshús	-	-	-	*23*
Rakstrargøgn	0	*0*	*269*	*269*

Støðisfæ	0	0	269	292
Aktiv samanlagt	3.315	4.183	5.863	5.200
Passiv				
Ognarar	2.028	2.437	3.083	1.874
Lán Føroya landsstýri	1.000	1.500	2.000	3.000
Bankaskuld	0	6	777	464
Fremmand fíggjan	3.028	3.943	5.860	5.338
Eginogn:				
saldo pr. 1.1.	240	3	÷139	÷1.306
Flutt frá rakstri	47	237	142	1.167
Egintígging	287	240	3	÷139
Passiv samanlagt	3.315	4.183	5.863	5.200

6. *Seinasta álit frá løgtingsgrannskoðarunum:*

Í seinasta áliti frá løgtingsgrannskoðarunum viðvíkjandi roknskapunum hjá Sjónvarpi Føroya fyri árini 1989-91, dagfest 18.3.1993 varð mælt til at løgtingslóg um sjónvarp, og reglugerð um starv sjónvarpsnevndarinnar, verða endurskoðaðar og tillagaðar nútíðar viðurskiftunum, og tikið verður undir við at ásettar verða nærri roknskaparreglur fyri almennar stovnar, harundir tilknýti til fíggjarlógina.

7. *Roknskapargrannskoðarin, viðmerkingar:*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapirnar og grannskoðanarprotokollirnar til tess vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

Grannskoðarin hevur ikki gjørt vart við serlig viðurskifti.

Upplýst verður, at sjónvarpsgjaldið í alt gav eina inntøku uppá 12.6 mió.kr., og við ársgjaldinum uppá kr. 1.100 svarar hetta til 11.487 hyggjarar, 43 fleiri enn í 1991.

Grannskoðarin ger vart við, at eftirstøðurnar seinastu átini hava verið ein vaksandi trupulleiki.

Upplýst verður, at allar íløgur eru úrtíðsluførdar, og frá komandi ári verða bert goldin sjónvarpsgjøld inntøkuførd, vísandi til, at roknskapurin í størri mun skal vera ein likviditetsroknskapur.

8. *Viðmerkingar:*

Heitt verður aftur á landsstýrið um at løgtingslóg um sjónvarp og reglugerð um starv sjónvarpsnevndarinnar verða endurskoðaðar og tillagaðar nútíðar viðurskiftum.

1. viðgerð 28. februar 1994. Samtykt at beina málið beinleiðis til 2. viðgerð.

2. viðgerð 4. mars 1994. Málið samtykt við 23-0 atkvøðum.

47 Grannskoðan av almennum roknskapum
8. Útvarp Føroya 1992

Ár 1994, týsdagin 22. februar løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

Álit

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Útvarpi Føroya fyri fíggjarárið 1992 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lógargrundarlag:

Útvarp Føroya varð sett á stovn við Ll nr. 23 frá 28.3.1956 við broytingum í Ll nr. 28 frá 17.5.1961, Ll nr. 22 frá 9.4.1964 og Ll nr. 32 frá 27.5.1968.

Arbeiðið hjá útvarpsnevndini er staðfest við Ll nr. 11 frá 14.2.1957 við broytingum í Ll nr. 38 frá 25.5.1963 og Ll nr. 25 frá 10.6.1971, og reglugerð nr. 51 frá 18.7.1957.

2. Endamál:

Sambært § 2, 1. stk. í reglugerð um starv útvarpsnevndarinnar fyrisetur nevndin reglur, ið hon heldur vera neyðugar, við tí endamáli at tað, sum útvarpað verður, hevur fjølbroytt, mentunarligt og upplýsandi innihald, og at hugsunarfrælsi, rættsinni og javnaður móti øllum

flokkum og stevnum í almennum málum. vinnustevnum. feløgum og einstakum monnum skulu ráða í útvarpinum.

3. *Fíggjarviðurskifti:*

Sambært lóg nr. 23 frá 28.3.1956 við seinni broytingum, setir landsstýrið fyristøðumann. ið hevur dagliga stýri útvarpsins eftir reglugerð. ið landsstýrið fyrisetur. Landsstýrið setur starvsfólk eftir tilmæli fyristøðumansins. Lønirnar hjá fyristøðumanni og starvsfólki verða ásettar av landsstýrinum sambært § 2.

Smb. § 3 skal gjald rindast til útvarpið av hvørjum radiomóttakara í landinum. Landsstýrið fyrisetur gjaldið fyri eitt ár í senn eftir tilráðing fíggjarnevndarinnar.

Sambært § 5 í lógini ger fyristøðumaðurin uppskot til fíggjarætlan fyri fíggjarárið og sendir landsstýrinum uppskotið innan 1. januar. Fíggjarætlanin verður tikin sum serstakur liður í fíggjarlóg landsins. Inntøkur útvarpsins verða bert at nýta til útvarpsendamál.

Sambært § 6 í reglugerðini heitir landsstýrið á nevndina og fær ummæli viðvíkjandi setan av útvarpsstjóra og starvsfólki, sum hevur fyrireiking av útvarpstilfari um hendi. eins luttekur í sjálvum útvarpingunum viðvíkjandi fíggjarætlan útvarpsins og støddina á útvarpsgjaldi.

Sambært § 2 hevur landsstýrið allan avgerðarrættin fyri øllum fíggjarligum útvarpinum viðvíkjandi.

- - - - -

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina hjá Útvarpi Føroya er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapunum fyri 1989-1992:

4. *Yvirlit yvir rakstur 1989-1992:*

Inntøkur	1992	*1991*	*1990*	*1989*
Útvarpsgjald	15.715	*13.951*	*11.718*	*12.576*
Kunngerðir	5.290	*4.508*	*4.394*	*4.766*
Kvøðuljómar	112	*125*	*113*	*113*
Rentur	1.481	*1.072*	*1.112*	*1.007*
Ymiskt	58	*131*	*100*	*÷94*
	22.656	*19.787*	*17.437*	*18.368*
Vinningur V-4	2.414	*2.974*	*2.857*	*3.032*
	25.070	*22.761*	*20.294*	*21.400*

Útreiðslur

Útvarpsstöðirnar og studiið	1.481	*528*	*904*	*943*
Útreiðslur viðv. útvarping:				
lønir	6.819	*6.782*	*5.806*	*4.971*
samsýningar	2.381	*2.519*	*2.713*	*2.658*
annað	3.197	*3.105*	*2.208*	*2.171*
Stjórnarútreiðslur:				
lønir	1.819	*1.958*	*1.774*	*1.590*
annað	2.361	*2.630*	*2.298*	*2.373*
Útvarpsnevndin	49	*89*	*56*	*31*
Avskrivingar og avsetingar	3.742	*2.840*	*2.141*	*4.007*
Avskrivingar av ettirstøðum	519	*420*	*280*	*189*
Rentur incl. kurstap	2.507	*1.835*	*2.086*	*2.361*
	24.875	*22.706*	*20.266*	*21.294*
Úrslit V-4	2.414	*2.974*	*2.857*	*3.032*
Úrslit útvarpsrakstur	÷2.219	*÷2.919*	*÷2.829*	*÷2.926*
Samlað úrslit	195	*55*	*28*	*106*

5. *Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1989-1992:*

Aktiv	1992	*1991*	*1990*	*1989*
Innistandandi í peningastovnum	17.920	*16.411*	*15.396*	*14.553*
Skuldarar:				
eftirstøður f.útvarpsgjald	7.392	*6.321*	*6.362*	*7.593*
aðrir skuldarar	921	*1.357*	*1.325*	*977*
Umferðarfæ	26.233	*24.089*	*23.083*	*23.123*
Útvarpshúsið og aðrar ognir	11.102	*14.418*	*15.036*	*16.758*
Støðisfæ	11.102	*14.418*	*15.036*	*16.758*
Aktiv samanlagt	37.335	*38.507*	*38.119*	*39.881*

Passiv				
Ognarar	2.343	*1.892*	*1.778*	*1.695*
Millumrokning við landskassan	0	*4.631*	*4.631*	*4.631*
Lán	8.234	*9.970*	*10.887*	*12.759*
Fremmand fíggjan	10.577	*16.493*	*17.296*	*19.085*
Eginogn:				
saldo pr. 1.1.	20.380	*20.324*	*20.295*	*16.190*
avsett til Útvarpshús	0	*35*	*500*	*0*
avsett til umvælan	752	*800*	*0*	*500*
avsett til ymisk prosjekt	800	*800*	*0*	*0*

rakstaravlop	195	55	28	106
eftirgeving av millumrokning við landskassan/landskassastudningur . .	4.631	0	0	4.000
Eginfígging	26.758	22.014	20.823	20.796
Passiv samanlagt	37.335	38.507	38.119	39.881

6. *Seinasta álit frá løgtingsgrannskoðarunum:*

Í seinasta áliti frá løgtingsgrannskoðarunum dagfest 18. februar 1993 viðvíkjandi roknskapunum fyri árini 1989-1991 varð m.a. gjørt vart við, at Útvarp Føroya hevði óvanliga nógv innistandandi í peningastovnunum, ultimo 1991, 16,5 mió.kr., og at áseting av útvarpsgjaldi ikki er í tráð við lógina, við tað at hetta í praksis er ógjørligt, eftirsum hvørt húsarhald í dag ofta hevur eini 4-5 smærri lurtitól. Mælt varð til, at løgtingslóg um útvarp, og reglugerð um starv útvarpsnevndarinnar, verða endurskoðaðar og tillagaðar nútíðar viðurskiftunum, og tikið verður undir við at ásettar verða nærri roknskaparreglur fyri almennar stovnar, harundir tilknýti til fíggjarlógina.

7. *Roknskapargrannskoðanin/viðmerkingar:*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapin og grannskoðanarprotokollina, til tess at vissa seg um at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

Roknskapargrannskoðanin hevur ikki gjørt vart við serlig viðurskifti. Í protokollini verður upplýst, at útvarpshúsið er avskrivað við uml. 1,7 mió.kr., svarandi til goldnar avdráttir í 1992 av lánum, ið upptikin eru til útvarpshúsið og íroknað ein eyka avdrátt uppá uml. 1 mió.kr. av kredittforeiningsláninum, og er hetta orsøkin til, at avskrivingarnar/avdráttirnir eru hækkaðar í mun til 1991. Nevnt verður, at leiðsla útvarpsins hevur avgjørt at gjalda kredittforeiningslánið aftur skjótari enn áður ætlað, og mett verður, at hetta er skilagott, tá hugsað verður um, at rentan av hesum láni er sera høg, men samstundis verður sjálvandi eitt stórt kurstap.

Av úrslitinum eru haraftrat avskrivaðar ialt uml. 2 mió.kr. av »studioútgerð, búnyttum, telduútgerð og bilum« svarandi til bókførda virðið.

Samlaða útvarpsgjaldið er uppá 15,7 mió.kr., og gevur hetta í meðal 19.643 lurtarar á kr. 800. Hetta er ein hækking í mun til 1991 uppá 2.205 lurtarar, og stavar hækkingin serliga frá at skráseting av bilradio er gjørd effektivari. Hækkaða talið á lurtarum vísir seg tó eisini aftur í teimum hækkaðu eftirstøðunum, og kann ikki roknast við at alt hetta fæst inn.

Upplýst verður eisini, at í sambandi við veðhaldsútlegg frá Føroya Landsstýri, stóðu t.kr. 4.631 eftir sum millumrokning 1. januar 1992, men hevur landsstýrið í 1992 eftirgivið upphæddina, og er hetta bókað yvir kapitalkonto útvarpsins.

8. *Viðmerkingar:*

Heitt verður aftur á landsstýrið um at endurskoða løgtingslóg um útvarp, m.a. vísandi til, at

áseting in av útvarpsgjaldi ikki er í tráð við lógina.

Útvarpið hevði 18 mió.kr. innistandandi ultimo 1992, og løgtingsgrannskoðararnir átala at landsstýrið, við góðkenning frá fíggjarnevndini, hava eltirgivið 4,6 mió.kr., uttan at hetta er gjørt við heimild í serstakari lóg ella tikið við á fíggjarlóg/eykafíggjarlóg.

1. viðgerð 28. februar 1994. Samtykt at beina málið beinleiðis til 2. viðgerð.

2. viðgerð 4. mars 1994. Málið samtykt við 21-0 atkvøðum.

47 Grannskoðan av almennum roknskapum 9. Føroya Jarðarráð 1993

Ár 1994, týsdagin 22. februar løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

Álit

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Føroya Jarðarráð fyri fíggjarárið 1992.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

Føroya Jarðarráð hevur tríggjar høvuðsuppgávur:

- fyrisiting av landsjørðini
- umsiting av jarðargrunninum
- umsiting av studningsskipanum

Fíggjarliga grundarlagið undir virki ráðsins eru játtanir á fíggjarlógini og søla av jørð:

- studningur til jarðargrunnin (fløgu- og rentustudningur).
- ymsir studningar, ið ráðið umsitur
- søla av festijørð.

Niðanfyri eru vístar tær upphæddirnar í 1992, ið jarðarráðið hevur fingið úr landskassanum til jarðargrunnin og til tær ymsu studningsskipanirnar, umframt inntøkurnar fyri sølu av jørð v.m. Til samanberingar eru tølini fyri 1991-1989 tikin við:

(mió.kr.)

	1992	1991	1990	1989
Íløgustudningur	3,2	3,5	4,6	6,0
Rentustudningur	1,0	1,0	2,2	2,2
Til grunnin	4,2	4,5	6,8	8,2
- Neytahald	12,0	12,5	13,0	13,0
- Kjøt/egg	2,5	2,8	2,8	3,2
- Stráfóður	1,1	1,3	0,7	0,9
- Nýdyrkan	2,7	2,5	2,2	2,8
- Húsdjóraaling	0,2	0,2	0,3	0,4
- Súrhoyggjabrunnar	0,3	0,3	0,3	0,4
Studningur ialt	23,0	24,1	26,1	28,9
Søla jørð v.m.	8,9	7,6	9,9	17,3
Samanlagt	31,9	31,7	35,0	46,2

Útlánini pr. 31.12. 1992 kunnu útgreinast til hesi endamál:

(mió.kr.)

	1992
Fjós	87
Seyðahús	11
Mjólkarvirkið	13
Traktorar og maskinur	8
Sethús	5
Kommunur	7
Vakstrarhús	4
Rakstrarlán	2
Grísagarðurin	2
Onnur lán	5
Samanlagt	147
Falnir avdráttir og rentur	9
	156
Avsett til tap	÷ 3
	153

Í álitinum fyri árini 1985-90, sum varð lagt fyri tingið 2. apríl 1992, gjørdu løgtingsgrannskoðararnir nakrar viðmerkingar, sum landsstýrið hevur svarað uppá í skrivi dagfest 26. november 1993.

1. Løgtingsgrannskoðararnir átalaðu, at landsstýrið ikki enn hevði kunngjørt reglugerðirnar sambært løgtingslóg nr. 59 frá 9. mei 1988 um landsjørð.

   Reglugerðin fyri Jarðarráðið er síðani lýst 26. august 1993. Kunngerð um festi var lýst

21. juli 1992, herundir eisini ásetan av festileigu.

2. Mælt varð til, at nærri reglur vórðu ásettar viðvíkjandi sølu av festijørð v.m. og nýtslu av festikonto.

   Í kunngerð nr. 164 frá 26. august 1993 vórðu reglur settar fyri sølu av jørð og útgjalding av festikonto, og er hetta samsvarandi praksis, ið var galdandi áður.

3. Mælt varð til, at lógararbeiðið viðvíkjandi landsjørðini verður gjørt liðugt, soleiðis at restin av ríkislógini og reglugerðini frá 1937 verður viðgjørd og tillagað nútíðar viðurskiftum.

   Landsstýrið boðar frá, at landsstýrismaðurin í landbúnaðarmálum hevur havt frammi at broyta bygnaðin innan landbúnaðin. Hetta arbeiði fer helst at krevja, at lógarverkið verður endurskoðað.

4. Løgtingsgrannskoðararnir átalaðu, at jarðarráðið ikki í øllum førum hevði víst neyðugt varsemi og tryggjað, at lán bert vórðu veitt til rentablar iløgur.

   Jarðarráðið tók átaluna til eftirtektar.

5. Løgtingsgrannskoðararnir mæltu til, at gjaldførið hjá grunninum varð tryggjað øðrvísi, so tað slapst undan lágrentaðum innistandandi og høgrentaðum útlánum.

   Jarðarráðið upplýsti, at tiltøk, sum Jarðargrunnurin fíggjar, ofta eru luttalsliga stór, og tí er neyðugt við reiðiliga nógvum tøkum peningi. Útlánsrenta grunsins er hækkað, og er sostatt talan um ein minni rentumarginal enn áður.

6. Løgtingsgrannskoðararnir átalaðu, at ráðið, hóast tað er ásett í galdandi reglugerð, ikki gevur út ársfrágreiðing um virki sítt.

   Jarðarráðið tók átaluna til eftirtektar og hevur upplýst yvirfyri landsstýrinum, at ársfrágreiðing hereftir verður latin landsstýrinum á hvørjum ári áðrenn 1. juli.

Roknskapargrannskoðanin/viðmerkingar:

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapirnar og grannskoðanarprotokollirnar til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

Burtursæð frá avseting ímóti tapum uppá 3 mió.kr., verður ikki í grannskoðanarprotokillini gjørt vart við serlig viðurskifti.

1. viðgerð 28. februar 1994. Samtykt at beina málið beinleiðis til 2. viðgerð.

2. viðgerð 4. mars 1994. Málið samtykt við 23-0 atkvøðum.

47 Grannskoðan av almennum roknskapum
10. Vakstrarhúsgrunnurin 1992

Ár 1994, týsdagin 22. februar løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

Álit

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Vakstrarhúsgrunninum fyri fíggjarárið 1992.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

Vakstrarhúsgrunnurin er ikki stovnssettur við lóg, men landsstýrið gjørdi í november 1985 eina interna reglugerð fyri grunnin, og grunnurin verður fyrisitin av Føroya Jarðarráð.

Játtanin til grunnin á fíggjarlógini fyri 1992 var 400 t.kr.

Fíggjarstøða grunsins er sambært ársroknskapin henda:

	(mió.kr.)
Útlán til vakstrarhús	2,7
Falnir avdráttir og rentur	1,4
	4,1
Avsett til tap	÷3,0
	1,1
Innistandandi í peningastovni	3,7
	4,8

Í álitinum fyri árini 1987-90, dagfest 2. apríl 1992, varð m.a. mælt landsstýrinum til at endurskoða reglugerðina og í øðrum lagi umhugsa at avtaka Vakstrarhúsgrunnin.

Landsstýrið hevur í skrivi dagfest 26. november 1993 upplýst, at Jarðarráðið mælir til, at grunnurin verður varðveittur, soleiðis at Jarðarráðið varðveitir heimildina at stuðla/fíggja vakstrar- og grønmetisvinnu, sum Jarðargrunnurin ikki heimilar. Landsstýrið fer tí at heita á Jarðarráðið um at gera uppskot til endurskoðan av reglunum fyri Vakstrarhúsgrunnin.

Vísandi til, at landsstýrið á flest øllum økjum hevur avtikið grunnar við tí fyri eyga at geva

politisku myndugleikunum ein møguleika at gera sær eina mynd av nýtsluni í einum fíggjarári, verður mælt landsstýrinum til at umhugsa spurningin um avtøku av grunninum av nýggjum.

1. viðgerð 28. februar 1994. Samtykt at beina málið beinleiðis til 2. viðgerð.

2. viðgerð 4. mars 1994. Samtykt við 24-0 atkvøðum.

47 Grannskoðan av almennum roknskapum 11. Strandfaraskip Landsins 1992

Ár 1994, hósdagin 21. apríl løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

Álit

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Strandfaraskipum landsins fyri fíggjarárið 1992 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Endamál:

Sambært reglugerð, lýst við kunngerð nr. 81 frá 22. august 1984, er Strandfaraskip Landsins stovnur undir Føroya Landsstýri, sum m.a. hevði til endamáls:

1. at reka rutusigling innanoyggja við fólki og farmi, rutukoyring við farmi og tyrluflutning,
2. at vera tænastuveitandi stovnur og í so stóran mun sum gjørligt rikin út frá handilsligum sjónarmiði.

Á landsstýrisfundi 14. november 1992 varð omanfyrinevnda reglugerð avtikin og nýggj reglugerð fyri Strandferðsluna samtykt. Sambært hesi reglugerð er Strandferðslan ein landsfyritøka

undir Føroya Landsstýri, sum hevur til endamáls:

1. at vera tænastuveitandi fyriuøka, við tí fyri eyga at lúka landsins tørv á inniendis fólka- og farmaflutningi,
2. í so stóran mun sum gjørligt, at verða rikin út frá handilsligum sjónarmiðum.

Virksemið, ella partar av hesum, kann verða skipað í partafeløg, og verður stjórin tá stjóri ella formaður í hesum partafeløgum. Stjórin leggur uppskot um stovnan av slíkum feløgum fyri landsstýrið.

2. *Fíggjarviðurskifti:*

Sambært reglugerðini frá 1984 ásetir landsstýrið talið av starvsfólki eftir nærri avtalu við stjóran og skal góðkenna ferðaætlantir, flutnings- og farmagjøld, umframt allar ætlanir um útbygging, umskipan og nýskipan av Strandferðsluni. Fíggjar-, rakstrar- og íløguætlan fyri Strandferðsluna skuldu á hvørjum ári latast landsstýrinum til góðkenningar í seinasta lagi 1. oktober.

Sambært nýggju reglugerðini verður takstpolitikkur, útbyggingar-, fíggjar-, rakstrar-, ferða- og íløguætlan skipað í 4 ára ætlanum, sum á hvørjum ári verða endurskoðaðar og lagdar fyri landsstýrið til góðkenningar í seinasta lagi 1. apríl.

3. *Starvsfólkaviðurskifti*

Í reglugerðini frá 1984 var ásett, at landsstýrið setir og loysir úr starvi leiðandi starvsfólk og skiparar, og at stjórin setir og loysir úr starvi starvsfólkið annars, í samráð við avvarðandi leiðara/skipara.

Í nýggju reglugerðini er ásett, at landsstýrið setur, eftir tilmæli frá stjóranum, allar leiðarar á 1. stigi. Stjórin setur annað starvsfólk sambært galdandi reglum.

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina hjá Strandferðsluni er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapunum fyri árini 1989-1992:

4. *Yvirlit yvir rakstur 1989-1992:*

Inntøkur:	1992	*1991*	*1990*	*1989*
Farmagjald	16	*14*	*15*	*16*
Persónsflutningur	40	*39*	*39*	*39*
Postflutningur	1	*1*	*1*	*1*
Eykatúrar (incl. tyrlur)	4	*9*	*4*	*6*
Kiosk & Kafeteria	7	*5*	*3*	*3*
Inntøkur samanlagt	68	*68*	*62*	*65*

Útreiðslur:				
Hýrur	46	42	46	49
Olja	12	12	16	15
Umsiting og eykalutir	20	22	20	18
Tryggingar	4	4	4	5
Havnagjøld	4	4	4	4
Aðrar rakstrarútreiðslur	13	15	12	14
Rakstrarútreiðslur samanlagt	99	99	102	105
Skrivstovulønir	10	9	9	9
Aðrar fyrisitingarútreiðslur	11	7	7	7
Rentuútreiðslur, netto	2	3	2	2
Avskrivingar, rakstrargøgn	3	3	5	4
Tap, skuldarar	4	2	-	2
Útreiðslur samanlagt.	129	123	125	129
Úrslit:	÷61	-55	-63	-64
Áttan ialt	51	50	46	56
Meirnýtsla	÷10	-5	-17	-8

5. *Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1989-1992:*

Aktiv:	1992	1991	1990	1989
Kassi, bank & Giro	1	1	1	4
Skuldarar	12	11	10	9
Eykajáttan 9				
Tryggingarendurgjald ÷6	3	8	-	-
Bygningar, bilar v.m.	1	3	6	8
Aktiv samanlagt	17	23	17	21
Passiv:				
Kassakredittur	10	10	21	8
Ognarar	14	10	6	10
Millumrokning, landskassan	÷7	3	-10	3
Passiv samanlagt	17	23	17	216.

Serroknskapir fyri skip, bilar og tyrlur:

Umframt ársroknskap fyri samlaða virksemið hjá Strandferðsluni, ger Strandferðslan á hvørjum ári serroknskapir fyri hvørt skip sær, bilarnar og tyrlurnar undir einum.

Í serroknskapunum eru inntøkurnar og rakstrarútreiðslurnar útgreinaðar á tær ymsu flutningseindirnar. Niðanfyristandandi er gjørdur ein samandráttur av serroknskapunum fyri árini 1990-1992:

(mió.kr.)

	1992			1991			1990		
	Inn-tøkur	Rakst.-útreiðs.	Úr-slit	Inn-tøkur	Rakst.-útreiðs.	Úr-slit	Inn-tøkur	Rakst.-útreiðs.	Úr-slit
Smyril	12,0	20,7	÷8,7	9,6	20,4	÷10,8	11,1	19,7	÷8,6
Teistin	14,3	21,8	÷7,5	11,6	18,5	÷6,9	10,8	20,7	÷9,9
Sam	8,3	5,9	+2,4	9,4	4,8	+4,6	6,3	4,5	+1,8
Ternan I	1,1	1,4	÷0,3	1,6	3,0	÷1,4	2,6	3,4	÷0,8
Fagrances	1,2	0,8	+0,4						
Ternan	11,2	8,9	+2,3	11,8	7,4	+4,4	9,8	8,0	+1,8
Dúgvan	3,8	6,6	÷2,8	5,5	8,3	÷2,8	6,0	8,7	÷2,7
Tróndur	4,2	6,7	÷2,5	4,2	7,3	÷3,1	3,0	7,4	÷4,4
Ritan	1,4	2,8	÷1,4	1,0	3,4	÷2,4	1,4	3,1	÷1,7
Másin	0,3	1,7	÷1,4	0,3	1,8	÷1,5	0,3	1,8	÷1,5
Pride	0,2	0,7	÷0,5	0,5	1,5	÷1,0	0,1	0,6	÷0,5
Súlan	0,2	0,5	÷0,3	0,2	0,7	÷0,5	0,2	0,6	÷0,4
Barskor	0,4	1,4	÷1,0	0,6	1,4	÷0,8	0,4	1,4	÷1,0
Sildberin	0,1	1,3	÷1,2	0,1	1,2	÷1,1	0,1	1,2	÷1,1
Skip ialt	58,7	81,2	÷22,5	56,4	79,7	÷23,3	52,1	81,1	÷29,0
Bilarnir	5,3	7,0	÷1,7	6,0	7,2	÷1,2	6,0	7,6	÷1,6
Tyrlur	4,0	11,3	÷7,3	5,3	12,4	÷7,1	3,9	13,3	÷9,4
Ialt	68,0	99,5	÷31,5	67,7	99,3	÷31,6	62,0	102,0	÷40,0
Aðrar útreiðslur			÷29,3			÷23,2			÷23,7
Samlað úrslit			÷60,8			÷63,2			÷55,3

Í grannskoðanarprotokollini verður gjørt vart við, at vegna broytingum í kontoskipanini v.m. er ein beinleiðis samanbering millum tølini fyri 1992 og hini árini ikki gjørlig, serliga viðvíkjandi fyrisitingarútreiðslum.

7. *Seinasta álit frá løgtingsgrannskoðarunum:*

Í seinasta álit frá løgtingsgrannskoðarunum dagfest 18. februar 1993 viðvíkjandi roknskapunum fyri 1989-1991 varð gjørd ein serlig frágreiðing um meirnýtslu og lántøku uttan heimild og løgtingsgrannskoðararnir átalaðu, at skiftandi landsstýri høvdu nýtt og lænt pening uttan heimild, og ikki tikið stig til at bøta um teir grundleggjandi trupulleikarnar í sambandi við rakstur av Strandfaraskipum Landsins, hóast grannskoðanin í áravís hevði gjørt vart við hesi viðurskifti. Átalað varð, at landsstýrið hevði avtikið eina áður lýsta reglugerð og sett eina nýggja í gildi, uttan at hetta varð lýst.

Viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 61/1990 um Skálafjarðarsiglingina átaladu løgtingsgrannskoðararnir, at Lassi Klein, løgtingsmaður, í einum løgtingsmáli bar fram so skeivar upplýsingar, og harvið avlagaði eitt skilagott og sakligt orðaskifti um hetta mál.

8. *Viðmerkingar frá roknskapargrannskoðanini.*

Í átekningini verður gjørt vart við, at Strandferðslan liggur í sak við eitt av fyrrverandi starvsfólkunum fyri eina upphædd uppá umleið 770.000 kr.

Í grannskoðanarprotokollini verður víst á, at stovnurin við tí nýggju EDV-skipanini er førur fyri leypandi at fylgja gongdini í inntøkum og útreiðslum og at samanbera hesar við ætlanina. Møguligt er at gera justeringar tá neyðugt er. At billettmaskinurnar eisini eru tiknar í brúk, ger tað møguligt at luta inntøkurnar á rætta stað.

Samanumtikið metir grannskoðari stovnsins, at Strandferðslan nú hevur tey neyðugu amboðini, soleiðis at ein verulig fíggjarstýring av stovninum kann fara fram. Samstundis verður upplýst, at Strandferðslan fyri 1993 hevur lagt eina rakstrarætlan, soleiðis at tað nú ber til mánað fyri mánað at fylgja við, um gongdin er í samsvari við ta játtan, stovnurin fær.

Samlaðar farmagjaldsinntøkur í 1992 vóru 16 mió.kr. Granuskoðarin metir, at tað er ov stórur partur at hava 12 mió.kr. útistandandi við ársenda 1992. Mælt verður til, at privatir kundar, í tann mun tað letur seg gera, rinda kontant, og at vinnufeløg fáa kreditt við einum ávísum maximum. Upplýst verður, at strandferðslan hevur lagt stóra orku í at krevja útistandandi inn, og í mars mánaði 1993 eru skuldararnir minkaðir til 6,2 mió.kr.

Grannskoðarin metir ikki, at innanhýsis mannagongdin á ferðaseðlaøkinum hevur verið nóg trygg. Veikleikin vísir seg, tá skipini avrokna ferðaseðlainntøkurnar. Grannskoðarin hevur gjørt vart við viðurskiftini og mælt til at fáa hetta í rættlag.

Grannskoðarin ger vart við, at meirnýtslan hjá Strandferðsluni í 1992 var 9,8 mió.kr. og er henda útgreinað soleiðis:

(mió.kr.)	
Játtan 1992	42.0
Eykajáttan 1992	9.0
Játtan í alt	51.0
Hall 1992	60.8
Meirnýtsla	9.8

9. *Viðvíkjandi landsstýrisins góðkenning av ársroknskapinum hjá Strandferðsluni fyri 1992.*

Landsstýrið hevur á fundi 24. mars 1994 samtykt at góðkenna roknskapin, men átalar, at Strandferðslan hevur disponerað yvir tryggingarendurgjaldinum kr. 6.118.000 fyri tyrluna viðvíkjandi til, at tyrlan var ogn hjá landskassanum, og átti tyrluendurgjaldið sostatt ongantíð at hava gingið inn í raksturin hjá Strandferðsluni. Landsstýrið ger eisini vart við, at tað metir tað vera sera ivasamt, um tað er lógligt at ávísa pening til umvæling av hinari tyrluni hjá Strandferðsluni, tá peningur ongantíð er játtaður til hetta endamál.

Uppá fyrispurning upplýsir leiðslan á Strandferðsluni fyri løgtingsgrannskoðarunum, at

mannagongdin viðvíkjandi nýtsluni av einum parti av tryggingarendurgjaldinum (4 mió.kr.) til endurbygging av tyrluflúgvingini var sambært avtalu við táverandi landsstýrismann í samferðslumálum.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla til, at landsstýrið og strandferðslan skrivliga avtala eina fasta mannagongd viðvíkjandi tryggingarendurgjaldi/umvælingum, so tað framyvir slepst undan iva um nær rætt er atborið.

10. Viðmerkingar:

Átalað verður, at Strandferðslan aftur í 1992 hevur brúkt nógv meira enn játtað varð á fíggjarlóg/eykafíggjarlóg, og at landsstýrið enn einaferð hevur sett eina órealistiska upphædd á fíggjarlógina.

1. viðgerð 26. apríl 1994. Samtykt at beina málið beinleiðis til 2. viðgerð.

2. viðgerð 27. apríl 1994. Samtykt við 25-0 atkvøðum.

47 Grannskoðan av almennum roknskapum 12. Telefonverk Føroya Løgtings 1992

Ár 1994, fríggjadagin 15. apríl løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

Álit

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Telefonverki Føroya Løgtings fyri fíggjarárið 1992 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. *Lógargrundarlag v.m.:*

Telefonverk Føroya Løgtings er stovnur undir Føroya Landsstýri og virkar eftir:

- lóg nr. 111 frá 30. mei 1927 um »Lov om telefoner paa Færøerne«,
- løgtingslóg nr. 11 frá 24. september 1970 um »broyting í lóg um telefonir í Føroyum«
- løgtingslóg nr. 28 frá 22. mei 1969 um »áseting av telefongjøldum«
- kunngerð nr. 10 frá 18. februar 1987 »Reglugerð fyri Telefonverk Føroya Løgtings«, og
- kunngerð nr. 85 frá 18. desember 1985 um »telefongjøld v.m.«.

2. *Endamál:*

Sambært reglugerðini er Telefonverk Føroya Løgtings stovnur undir Føroya landsstýri, sum hevur til endamáls:

1. at lúka landsins tørv á telefonsambandinum innanlendis og millum Føroyar og útheimin,
2. at vera tænastuveitandi stovnur og í so stóran mun sum gjørligt rikin út frá handilsligum sjónarmiðum,

3. at laga seg eftir menning samfelagsins og átaka sær virksemi, tá ið viðurskiftini tala fyri tí.
4. at hava samvinnu á breiðum grundarlagi við postverkið, gjaldstovuna og aðrar almennar stovnar.

3. *Fíggjarviðurskifti:*

Sambært reglugerðina fyri telefonverkið (frá februar 1987) skal landsstýrið seta ein fíggjarstjóra, sum undir telefonverksstjóranum hevur ábyrgdina av fíggjardeild og fyrisiting telefonverksins.

Somuleiðis skal setast ein tekniskur stjóri, sum undir telefonverksstjóranum hevur ábyrgdina av teknisku útbygging og tekniska rakstri telefonverksins.

Landsstýrið ásetir talið á starvsfólki, og skal í samráð við telefonverksstjóran seta reglur fyri fíggjardeild telefonverksins.

Útbyggingar-, fíggjar-, rakstrar- og fløguætlan fyri telefonverkið skal á hvørjum ári latast landsstýrinum til góðkenningar í seinasta lagi 1. juli.

Til tess at ráðgeva landsstýrinum um útbyggingarætlanir, skal skipast ein teknisk nevnd við trimum limum, valdum av landsstýrinum.

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina hjá telefonverkinum, er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapunum fyri tíðarskeiðið 1989-1992.

4. *Yvirlit yvir rakstur 1989-1992*

(Mió.kr.)

	1992	*1991*	*1990*	*1989*
Telefonfelagagjøld	26	*25*	*24*	*22*
Samtaluinntøkur	88	*86*	*85*	*72*
Annað	26	*26*	*31*	*37*
Inntøkur talt	140	*137*	*140*	*131*
Kostnaður talt	÷71	*÷63*	*÷54*	*÷52*
Rakstrarúrslit	69	*74*	*86*	*79*
Avskrivingar	÷31	*÷30*	*÷30*	*÷27*
Rentur v.m. netto	÷25	*÷17*	*÷34*	*÷22*
Úrslit áðrenn óvanligar upphæddir	13	*27*	*22*	*30*
Óvanligar inntøkur netto	2	*11*	-	-
Niðurskriving av partabrøvum	÷3	—	—	—

Úrslit	12	38	22	30
Útgoldnar lønir	48	47	48	49

5. *Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1989-1992:*

AKTIV:	1992	1991	1990	(Mió.kr.) 1989
Tøkur og bundin peningur	33	21	7	1
Onnur virði í umferð	23	21	29	27
Partabrøv í atknýttum virki	2	5	5	-
Íløgur	356	363	368	367
Aktiv samanlagt	414	410	409	395
PASSIV:				
Stuttfreistað skuld	27	22	39	35
Langfreistað skuld				
- Íleggingargrunnurinn	42	44	47	38
- Uttanlandslán	230	241	258	279
Skuld samanlagt	299	307	344	352
Eginogn	115	103	65	43
Passiv samanlagt	414	410	409	395

6. *Seinasta álit frá løgtingsgrannskoðarunum:*

Í seinasta álitið frá løgtingsgrannskoðarunum dagfest 18. februar 1993 gjørdu løgtingsgrannskoðararnir nakrar viðmerkingar, sum landsstýrið hevur svarað uppá í skrivi dagfest 30. desember 1993.

1. Løgtingsgrannskoðararnir átalaðu, at telefonverkið við landsstýrisins góðkenning, í sambandi við keyp av bygninginum á Hálsi, keypti partabrøvini í felagnum, ið átti bygningin, til kurs 1000, vegna tess at hesin keypsháttur var ein skattafyrimunur fyri seljaran, hóast telefonverkið tískil fekk bygningin bíligari, og keypið tí kann sigast at vera í tráð við reglugerðina, har stovnurin so vítt gjørligt skal rekast út frá handilsligum sjónarmiðum.

Landsstýrið hevur tikið hesa átalu til eftirtektar.

2. Álagt varð landsstýrinum at taka stig til at reglugerðin fyri telefonverkið verður hildin:

§ 2: viðvíkjandi setan av fíggjarstjóra
§ 3: viðvíkjandi reglum fyri fíggjardeild telefonverksins
§ 5: viðvíkjandi val av tekniskari nevnd

og at landsstýrið gjøgnumgongur og góðkennir allar skipanir viðvíkjandi samsýning til starvsfólk fyri telefongjøld, nýtslu av egnum bili o.a.

Landsstýrið upplýsir, at fíggjarstjóri er settur frá 1. juni 1993 at rokna, og at landsstýrið arbeiðir við at gera reglur fyri fíggjardeild telefonverksins og val av tekniskari nevnd.

3. Mælt verð landsstýrinum til at gera eina løgfrøðiliga meting av, um tað er í tráð við stýrisskipanarlógina, at virksemi telefonverksins (og hjá øðrum líknandi stovnum) ikki longur verður tikið við á fíggjarlógina.

Landsstýrið upplýsir, at telefonverkið átti at verið tikið við á fíggjarlógina, jvb. § 21 í stýrisskipanarlógini.

7. *Roknskapargrannskoðanin/viðmerkingar:*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapin og grannskoðanarprotokollina, til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

Grannskoðarin ger vart við, at hann í fleiri ár hevur mælt til ,at verkið ger bókling við skrivligum vegleiðingum fyri innanhýsis mannagongdir í heila tikið. Leiðsla telefonverksins upplýsir, at hetta arbeiði er byrjað, samstundis sum ein nýggj fíggjarskipan verður tikin í nýtslu pr. 1.4.1994.

Vart verður aftur gjørt við, at tað ikki er møguligt at gera eina avstemman millum felagahókhaldið og høvuðsbókhaldið, og at tað tí hevur serliga stóran týdning, at mannagongdirnar eru greiðar og kendar. Mett verður, at ábøtur mugu gerast, so henda avstemman gerst møgulig. Leiðsla telefonverksins upplýsir, at henda avstemman ikki kann gerast í núverandi skipan, men í sambandi við ta nýggju roknskaparskipanina er ætlanin at menna eina nýggja skipan, so hetta kann lata seg gera.

Í samhandi við óvarnað kassaeftirlit verður heilt á stovnin um at ábøtur verða gjørdar viðvíkjandi avstemman av peningakonti. Leiðsla telefonverksins upplýsir, at ábøtur hesum viðvíkjandi eru gjørdar.

Grannskoðarin metir, at innanhýsis mannagongdin í sambandi við frágongd av goymsluni nú er fingið í rættlag, og at í mun til undanfarin ár hevur stýringin av íløgunum hjá TFL verið neyvari í 1992. Fyri at hava betri eftirlit við ognunum hjá verkinum, verður mælt leiðsluni til at taka eitt fullfíggjað ognarkartotek í nýtslu, sum verður dagført leypandi, so hvørt sum broytingar henda.

Víst verður á, at rentur v.m. er ávirkað av, at kursvinningurin í 1992 bert hevur verið 1 t.kr. í mun til ein kursvinning uppá heilar 9.104 t.kr. í 1991.

Viðmerkt verður eisini, at avskriving og avseting móti tapi av skuldarum 4 mió.kr. er nógv økt síðani 1991, tá hetta var 1,8 mió.kr. Hetta kemst av, at avseting í 1992 er 2,6 mió.kr., meðan henda var 1,0 mió.kr. í 1991. Harumframt hevur staðfest tap uppá skuldarar verið 1,4 mió.kr. í 1992, móti 0,8 mió.kr. árið fyri.

Í mun til undanfarin ár, eru í roknskapinum fyri 1992 avsettar 3,9 mió.kr. til frítíðarløn til fastløn, svarandi til 9% av útgoldnari løn.

Upplýst verður, at TFL hevur niðurskrivað partabrøvini sum verkið eigur í P/F Matr. 1381 F við umleið 3 mió.kr. til innara virði pr. 31.12.1992 uppá 2,1 mió.kr. Hesi hava eitt áljóðandi virði uppá 0,5 mió.kr. Hetta felagið eigur bygningin á Hálsi.

1. viðgerð 21. apríl 1994. Samtykt at beina málið beinleiðis til 2. viðgerð.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Samtykt við 28-0 atkvøðum.

47 Grannskoðan av almennum roknskapum 13. Postverk Føroya 1992

Ár 1994, friggjadagin 15. apríl løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

Álit

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Postverki Føroya fyri fíggjarárið 1992 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lógargrundarlag:

Postverk Føroya er stovnur undir Føroya landsstýri og virkar eftir:

- lóg nr. 17 frá 31. mars 1976 um Postverk Føroya, sum broytt við
- lóg nr. 113 frá 22. desember 1989.

- lóg nr. 45 frá 9. mei 1976 um starvsfólkaviðurskiftini hjá postverkinum,
- kunngerð nr. 78 frá 22. juli 1987, um posttakstir á bløðum, og
- kunngerð nr. 143 frá 17. desember 1990 um posttakstir.

2. *Endamál:*

Postverk Føroya hevur, sambært løgtingslóg nr. 17 frá 31. mars 1976 um Postverk Føroya, við seinni broytingum, til endamáls:

1. at lúka landsins tørv á post- og peningaflutningi innanlendis og millum Føroya og útheimin.
2. at vera tænastuveitandi stovnur, og í so stóran mun sum gjørligt rikin út frá handilsligum sjónarmiðum.
3. at laga seg eftir menning samfelagsins og átaka sær víðkað virksemi, tá ið viðurskiftini tala fyri tí.
4. at hava samvinnu á breiðum grundarlag við strandferðsluna, telefonverkið, gjaldstovuna og aðrar almennar stovnar.

3. *Fíggjarviðurskifti:*

Sambært løgtingslóg nr. 17 frá 31. mars 1976 um Postverk Føroya, er tað landsstýrið, sum ásetur talið á starvsfólki. Har ikki lógarreglur eru (§2, 4. stk.), verður starvsfólkið lønt og starvast eftir reglum settar av landsstýrinum.

Allar ætlanir um útbygging, umskipan og nýskipan av postverkinum, verða gjørdar av postverkinum í samráð við landsstýrið, og skulu góðkennast av landsstýrinum, áðrenn tær verða settar í verk (§3, 1. stk.).

Postverkið kann sum stovnur taka upp lán, tó treytað av landsstýrisins og fíggjarnevndarinnar góðkenning (§4).

Fíggjar, rakstrar- og íløguætlan fyri postverkið verður gjørd á hvørjum ári latin landsstýrinum (§ 5, 2. stk.).

- - - - -

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina hjá postverkinum, er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapunum:

4. *Yvirlit yvir rakstur 1989-1992:*

(mió.kr.)

Inntøkur:	1992	*1991*	*1990*	*1989*
Rakstrarinntøkur	58,1	*57,2*	*55,3*	*60.4*
Frímerkjadeildin, netto	6,1	*5,9*	*5.9*	*5,8*
Rentuinntøkur, netto	*3,4*	*2,5*	*3,9*	*3,4*
	67,6	*65,6*	*65,1*	*69,6*

Útreiðslur:				
Lønir, excl. Frímerkjadeildin	59,9	*61,0*	*64,4*	*63,6*
Postflutningur	2,7	*2,9*	*3,7*	*3,2*
Skrivstovuhald	2,7	*2,6*	*2,3*	*1,6*
Rakstur, leiga og viðlíkah.av bygningum	3,2	*3,7*	*5,5*	*4,5*
Rakstur av akførum	1,9	*1,7*	*1,6*	*1,9*
Keyp akfør og rakstrargøgn	2,0	*1,4*	*1,1*	*1,3*
Aðrar útreiðslur	1,2	*1,5*	*1,9*	*1,4*
Keyp av edv-tólum	0,5	*2,2*	*2,1*	*1,1*
	74,1	*77,0*	*82,6*	*78,6*
Úrslit áðrenn avskrivingar	÷6,5	*÷11,4*	*÷17,5*	*÷9,0*
Avskrivingar	÷1,5	*÷1,5*	*÷1,5*	*÷1,5*
Eyka útreiðslur	÷0,3	*0,0*	*0,0*	*0,0*
Hall	8,3	*12,9*	*19,0*	*10,5*
Játtan á fíggjarlógini	8,8	*15,0*	*3,0*	*3,0*
Eykajáttan	0,0	*0,0*	*14,0*	*0,0*
Játtan íalt	8,8	*15,0*	*17,0*	*3,0*

Samlaðar lønarútgjaldingar:

Útgoldnar lønir, Postverkið	59,9	*61,0*	*64,4*	*63,6*
Útgoldnar lønir, Frímerkjadeildin	12,1	*12,4*	*12,9*	*13,4*
Útgoldnar lønir í alt	72,0	*73,4*	*77,3*	*77,0*

5. *Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1989-1991:*

(mió.kr.)

Aktiv:	1992	*1991*	*1990*	*1989*
Kassa- og bankapeningur	57,3	*74,8*	*89,6*	*89,1*
Eykajáttan	0,0	*0,0*	*14,0*	*0,0*
Innistandandi á giro	÷49,9	*÷36,7*	*÷47,5*	*÷46,3*
Bankaskuld og onnur skuld	÷9,1	*÷37,8*	*÷57,1*	*÷44,8*
Tøkur peningur íalt	÷1,7	*0,3*	*÷1,0*	*÷2,0*
Lán til starvsfólkið	0,4	*0,4*	*0,4*	*0,5*
Onnur lán	3,6	*3,6*	*3,6*	*0,9*
Tilgóðar hjá P&T	0,1	*0,4*	*0,5*	*3,8*
Ikki goldið avísgjald	0,8	*0,8*	*0,8*	*0,6*
Aðrir skuldarar	0,6	*0,8*	*0,7*	*0,2*
Bygningar og grundøki	16,3	*14,3*	*13,5*	*15,0*
Aktiv íalt	20,1	*20,6*	*18,5*	*19,0*

Passiv:

Skuld fyri postflutning	0,0	*0,0*	*0,0*	*0,3*
Skyldugur kostnaður	1,3	*2,4*	*2,4*	*0,5*
Skuld til jólamerkjagrunnin	0,6	*0,6*	*0,6*	*0,7*
Stuttfreistað skuld íalt	1,9	*3,0*	*3,0*	*1,5*
Byggi- og rakstrargrunnur postverksins .	18,2	*17,6*	*15,5*	*17,5*
Passiv íalt	20,1	*20,6*	*18,5*	*19,0*

Játtanir á fíggjarlógini verða bókaðar beinleiðis á eginognina.

6. *Roknskapargrannskoðarin/viðmerkingar:*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapin og grannskoðanarprotokollina, til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókh..dsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

Viðvíkjandi postinum "Onnur lán" kr. 3.577.275 verður gjørt vart við, at posturin er samansettur av trimum upphæddum:

Forútgoldin húsaleiga til P/F IDE-Møblar	kr. 200.000
Lán til P/F IDE-Møblar	- 2.500.000
Útgoldið vegna P/F Bláhamar	- 877.275
	kr. 3.577.275

Viðvíkjandi forútgoldnari leigu og láni til Ide-Møblar er Postverkið av teirri áskoðan, at BRF hevur yvirtikið hesa skuld eftir at hava keypt Ide-húsið á tvingsilssølu. Triðja ár á rað upplýsir grannskoðarin, at hann ikki hevur ikki fingið váttan fyri, at BRF viðurkennir hesi krøv.

Viðvíkjandi áogninni hjá P/F Bláhamar verður mett ivasamt, um kravið er fult tryggjað.

7. *Viðmerkingar:*

11. november 1993 staðfesti landsrættarin dómin í Føroya Rætti um, at Postverkið hevði lænt P/F Sámal Bláhamar/P/F Super Dekk Service pening, og at 822 t.kr. við rentum skuldu afturgjaldast.

Postverkið hevur sostatt í 1989 uttan heimild »lænt« postgiropening og nýtt henda til at veita eitt lán. Sambært fyriliggjandi upplýsingum er sannlíkt, at talan verður um ein fíggjarligan miss.

Somuleiðis hevur postverkið í 1990 av postgiropeninginum lænt 2,5 mió.kr. til P/F IDÉ Møblar, uttan at hetta krav varð fult tryggjað, og BRF viðurkennir ikki hetta krav í dag. Lánið varð góðkent av landsstýrinum, men ikki av fíggjarnevndini, sambært § 4 í lóg um Postverk Føroya.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla landsstýrinum til at fylgja hesum málum upp eftir vanligu

reglunum til tess at staðfesta eina møguliga ábyrgd.

1. viðgerð 21. apríl 1994. Samtykt at beina málið beinleiðis til 2. viðgerð.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Málið samtykt við 28-0 atkvøðum.

47 Grannskoðan av almennum roknskapum 14. Íleggingargrunnurin fyri Føroyar 1992

Ár 1994, fríggjadagin 15. apríl løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

Álit

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Íleggingargrunninum fyri Føroyar fyri fíggjarárið 1992 við niðanfyristandandi viðmerkingum:

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. *Lógargrundarlag:*

Lógargrundarlagið undir Íleggingargrunninum er »Lov nr. 28« frá 29. januar 1964 »om en investeringsfond for Færøerne«, sum broytt við »Lov nr. 217« frá 27. maj 1970, »Lov nr. 153« frá 31. mars 1976 og »Lov nr. 566« frá 16. november 1977.

Við lógarbroytingini í 1976 fekk heimastýrið heimild at áseta nærri reglur fyri virki grunsins. Á landsstýrisfundi tann 1. desember 1978 samtykti landsstýrið reglugerð um stýrið fyri og virksemið hjá grunninum. Tann 13. oktober 1992 samtykti landsstýrið at broyta reglugerðina, og varð hendan lýst við kunngerð nr. 148 frá 20. oktober 1992 um virksemið hjá Íleggingargrunninum fyri Føroyar.

2. *Endamál:*

Sambært »Lov nr. 28« frá 29. januar 1964 við seinni broytingum er endamál grunsins at veita lán til størri almennar fløgur, ið verða metnar at vera neyðugar til menning av vinnulívinum, og har fígging ikki kann útvegast á annan hátt. Eisini kann grunnurin av teimum rentum og avdráttum, ið eru afturgoldin, veita lán til vinnurekandi og vinnufelagsskapir, sum verða hildnir at virka til frama fyri vinnulívið sum heild.

Sambært reglugerðini frá 1978 skulu lán einamest veitast til almennar fleggingar, sum út frá einum samfelagslígum heildarsjónarmiði gagna framtøkumøguleikum hjá føroyska samfelagnum. Harumframt kunnu veitast lán til stovnar ella grunnar, sum veita lán ella annan stuðul til privatar, almennar ella hálvalmennar vinnufyritøkur.

Við omanfyrinevndu kunngerð nr. 148 frá 20. oktober 1992 varð endamálið víðkað til eisini at fevna um lán til fíggjarstovnar. Hetta varð gjørt fyri at geva fleggingargrunninum heimild at veita lán til Fíggingargrunnin í sambandi við avtaluna, ið varð gjørt 6. oktober 1992 millum ríkisstjórnina og landsstýrið.

Við kunngerðini varð ásetingin í áður galdandi reglugerð um ábyrgd stýrisins av lciðslu grunsins tikin burturúr.

3. *Fíggjarviðurskifti:*

Sambært reglugerðunum frá 1978 og 1992 verður lánsvirksemi grunsins umsitið av Landsbanka Føroya. Rentur og avdráttir av veittum lánum skulu rindast landsbankanum.

Í skrivi dagfest 21. august 1980 boðaði landsstýrið Gjaldstovuni frá, at landsstýrið hevði gjørt av at leggja roknskaparhaldið og lánsumsitingina undir Gjaldstovuna, av tí at landsbankin ikki var byrjaður at virka, og er hetta ikki broytt síðani.

Sambært kunngerðini skal roknskapur grunsins grannskoðast av løggildum grannskoðara, og skal grannskoðaði roknskapurin sendast landsstýrinum til góðkenningar og forsætismálaráðnum til kunningar.

4. *Yvirlit yvir rakstur 1989-92:*

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina, er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapunum fyri 1989-1992:

(1000 kr.)				
Inntøkur	**1992**	***1991***	***1990***	***1989***
Renta av útláni	28.594	*30.000*	*30.622*	*28.423*
Renta av bankaogn	16.635	*14.787*	*11.679*	*11.235*
	45.229	*44.787*	*42.301*	*39.658*

Útreiðslur				
Fyrisiting/fundarpeningur v.m.	50	*70*	*73*	*72*
Grannskoðan	9	*12*	*17*	*15*
Avsett ímóti tapi	0	*70.000*	*0*	*0*
	59	*70.082*	*90*	*87*
Úrslit	45.170	*-25.295*	*42.211*	*39.571*

5. *Yvirlit yvir gongd í figgjarstøðuni 1989-1992:*

(1000 kr.)

Aktiv	**1992**	***1991***	***1990***	***1989***
P/F Føroya Banki	75.734	*126.265*	*90.817*	*46.560*
P/F Sjóvinnubankin	30.218	*110.368*	*94.401*	*63.741*
Lán veitt áðrenn 1992	322.679	*333.147*	*353.028*	*281.227*
Lán veitt í 1992	200.000	*20.000*	*10.000*	*98.000*
Eftirstøður	20.211	*13.834*	*10.663*	*27.212*
	648.842	*603.614*	*558.909*	*516.740*
Avsetingar	-70.000	*-70.000*	*0*	*0*
Aktiv í alt	578.842	*533.614*	*558.909*	*516.740*
Passiv				
P/F Sjóvinnubankin	32	*0*	*0*	*14*
Kreditorar	26	*0*	*0*	*28*
Stovnsfæ	140.000	*140.000*	*140.000*	*140.000*
Tiltaksgrunnur	438.784	*393.614*	*418.909*	*376.698*
Passiv í alt	578.842	*533.614*	*558.909*	*516.740*

6. *Roknskapargrannskoðanin/viðmerkingar:*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapin og grannskoðanarprotokollina til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

Í grannskoðanarátekningini verður gjørt vart við, at lánið til Fíggingargrunnin er niðurskrivað til 190 mió.kr.

Í grannskoðanarprotokollini eru lán, veitt úr grunninum, útgreinað:

(mió.kr.)

	Høvuðsstólur	Restskuld
SEV	318	195
Føroya Ídnaðargrunnur	133	82
Telefonverkið	50	42
Menningargrunnur Ídnaðarins	5	2
Føroya Landsstýri	3	1
Lán veitt áðrenn 1992	509	322
Lán veitt í 1992 (Fíggingargrunnurin)	200	200
Eftirstøður	0	20
	709	542

Upplýst verður, at eftirstøðurnar uppá 20 mió.kr. viðvíkja lánunum til Føroya Ídnaðargrunn, og at nevndin eftir umsókn hevur samtykt at veita Ídnaðargrunninum skáa fyri teir avdráttir, ið ikki eru goldnir 1991 og 1992.

7. *Lán til Fíggingargrunnin:*

Íleggingargrunnurin veitti í 1992 Fíggingargrunninum lán uppá 200 mió.kr. í sambandi við endurreisingina av P/F Sjóvinnubankanum. Henda pening hevur Íleggingargrunnurin mist, og løgtingsgrannskoðararnir vilja tí í stuttum kunna løgtingið um gongdina í hesum máli:

Í avtaluni frá 6. oktober 1992 millum donsku stjórnina og landsstýrið í sambandi við endurreisingina av P/F Sjóvinnubankanum stendur, at »Landsstyret og Investeringsfonden for Færøerne foretager kapitalindskud i en nyoprettet fond på 500 mio.kr.«

Fyrst í oktober mánað 1992 valdi landsstýrið limir sínar í stýrið fyri Íleggingargrunnin, og á nevndarfundinum tann 11. oktober 1992 varð avgjørt at veita einum grunni undir stovnan (Fíggingargrunnurin) lán uppá 200 mió.kr. Ásett varð, at lánið skuldi rentast við diskontoini, at renturnar skuldu gjaldast, at lánið skuldi vera avdráttarfrítt í 3 ár og síðan afturgjaldast yvir 10 ár og at Íleggingargrunnurin skuldi hava framihjárættindi í møguligum afturgjaldingum av ábyrgdarpeningi og trygd í øllum partapeningi, sum Fíggingargrunnurin setti í P/F Sjóvinnubankan.

Men sambært krøvum frá ríkisstjórnini vórðu hesar treytirnar broyttar tvær ferðir, og sambært tí endaligu lánsavtaluni, sum varð undirskrivað 5. november 1992, skuldi lánið bert rentast, um Fíggingargrunnurin fekk vinningsbýti ella rentur av kapitalinnskoti grunsins í P/F Sjóvinnubankanum. Harumframt varð ásett, at lángevarin (Íleggingargrunnurin) skuldi niðurskriva lánið samsvarandi, um Fíggingargrunnurin varð noyddur at niðurskriva kapitalinnskot sítt. Avtala um afturgjalding skuldi sambært lánstreytunum verða gjørd í seinasta lagi 1. januar 1999, um so var, at lánið ikki til ta tíð var fult niðurskrivað (avskrivað). Ongar ásetanir vóru í tí endaligu avtaluni um trygd fyri láninum.

Í skrivi dagfest 17. februar 1993 boðaði Fíggingargrunnurin Íleggingargrunninum frá, at Fíggingargrunnurin í sambandi við endurreisingina av P/F Sjóvinnubankanum var noyddur at niðurskriva kapitalinnskot sítt við 440 mió.kr., og varð Íleggingargrunnurin biðin um at

niðurskriva 200 mió.kr.-lánið við 190 mió.kr. Ískoytið til lánsavtaluna frá 5. november 1992 viðvíkjandi niðurskrivingini varð undirskrivað av Íleggingargrunninum 9. mars 1993.

Tann 19. november 1993 boðar Fíggingargrunnurin Íleggingargrunninum frá, at neyðugt hevði verið at avskriva allan partapening grunsins í P/F Sjóvinnubankanum, og at ábyrgdarpeningurin samstundis var niðurskrivað til 0, og varð Íleggingargrunnurin biðin um at niðurskriva restskuldina av 200 mió.kr.-láninum (10 mió.kr.) til 0, sum liður í endurreisingarætlanini.

Hetta játtaði stýrið í skrivi dagfest 20. november 1993 til Fíggingargrunnin.

8. *Viðmerkingar:*

§ 3 í »Lov om en investeringsfond for Færøerne« er sera vítt orðað, so tað ber ikki til at siga at »lánið« til Fíggingargrunnin í sambandi við endurreisingina av P/F Sjóvinnubankanum er í stríð við lógina.

Men løgtingsgrannskoðararnir meta, at lánið, lánstreytirnar og endamálið við láninum ikki eru í tráð við upprunaliga endamálið hjá virksemi Íleggingargrunsins.

Leikluturin hjá stýrinum fyri Íleggingargrunninum hevur verið at staðfesta avtalur/avgerðir, sum vóru tiknar longu áðrenn stýrið fyri grunnin varð valt, eftir at grunnurin hevði ligið í stjórnarloysi í nærum hálvt annað ár.

1. viðgerð 21. apríl 1994. Samtykt at beina málið beinleiðis til 2. viðgerð.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Málið samtykt við 28-0 atkvøðum.

47 Grannskoðan av almennum roknskapum 15. Landskassin 1989-91

Ár 1994, mikudagin 21. apríl løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

Álit

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Landskassanum fyri figgjarárini 1989-1991 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lógargrundarlag, roknskapar- og figgjarviðurskifti:

Í frágreiðingini í landsroknskapinum fyri 1991 verður m.a. víst á, at sambært stýrisskipanarlógini skal ársroknskapurin gerast fyri virksemi landskassans. Roknskapurin skal, sambært lóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum, innan 8 mánaðir aftaná, at figgjarárið er lokið, sendast løgtingsgrannskoðarunum, sum í seinasta lagi 16 mánaðir aftaná vera at gera álit um roknskapin og leggja hann fyri tingið til samtyktar.

Reglur viðvíkjandi ávísing av útreiðslum úr landskassanum eru ásettar í reglugerð landsstýrisins frá 12. januar 1990.

Tað er ikki í lóggávu ella á annan hátt nærri ásett, hvussu landsroknskapurin skal uppsetast, hvørjir stovnar skulu takast við, og hvørjar upplýsingar skulu vera við, eins og tað heldur ikki eru ásett beinleiðis krøv um reglugerðir og fyriskipanir fyri almennar stovnar, harundir lýsing av uppgávum, endamáli og skráseting hesum viðvíkjandi.

Fyri at bøta um hesi viðurskifti legði landsstýrið í 1993 uppskot fyri tingið til samtyktar um lóg um landsins almenna roknskaparhald v.m. Lógin er síðani samtykt við gildi frá 1. januar 1995. Lógin skal, umframt ásetingar um hvønn roknskaparhaldið fevnir um, útvega landsstýrinum heimild at áseta, hvørjar uppgávur roknskaparhald landsins skal loysa, hvussu roknskaparhaldið verður fyriskipað, krøv til roknskaparførslu og um arbeiðsgongdir í sambandi við m.a. út- og inngjaldingar.

Viðvíkjandi innløkum, útreiðslum og lántøku eru hesar ásetingar í Ll. nr. 1 um stýrisskipan Føroya í sermálum:

§ 19: *»Ongin skattur má verða álagdur, broyttur ella avtikin uttan við løgtingslóg. Lán, ið skuldbindur Løgtingið, má ikki verða tikið, og má heldur ikki søla ella onnur latan av hendi*

av fastognum landsins ella nýtsluretti teirra fara fram uttan samsvarandi løgtingslóg.«

§ 21: *»Áðrenn figgjarlóg ella bráðfeingis figgjarlóg er samtykt á Løgtingi, má skattur ikki verða kravdur.*

Ongin útreiðsla má verða goldin, ið ikki er heimlað í figgjarlóg, galdandi, tá ið útreiðslan verður ávist, ella í aðrari galdandi heimildarlóg. Tær játtanir, ið eru ásettar í figgjarlóg ella aðrari heimildarlóg, mega bert verða goldnar í tí figgjarári, sum figgjarlógin er galdandi. Tó kann landsstýrið í tíðarskeiði inntil 3 mánaðir, aftan á figgjarárið er endað ávísa pening, ið er játtaður á figgjarlóginni fyri árið, ið fór.«

Í Ll. nr. 2 um umboðsvald Føroya er í § 9 ásett, at:

»hvør landsstýrismaður hevur yvir fyri Løgtinginum ábyrgd av at røkja tað umboðsvald og ta umsitan, sum teimum er latin upp í hendur, beint og forsvarliga.

Umboðanina av teimum økjum, ið eru undir landsstýrisins ræði, býta landsstýrismenn sín ámillum.

Løgmaður ávísir allar útreiðslur úr kassa landsins og ansar, at hesar útreiðslur eru ikki størri enn tær játtanir, sum tingið hevur samtykt.«

Sambært § 12 í somu lóg er ta skylda landsstýrisins:

»at ansa, at ongar útreiðslur verða goldnar, sum ikki hava heimild í figgjarlóg, ið er galdandi, tá ávísan fer fram, ella í aðrari galdandi heimildarlóg. Tær játtanir, sum eru ásettar við figgjarlóg ella aðrari heimildarlóg, kunnu bert verða goldnar í tí figgjarári, tá figgjarlógin er galdandi, eins og yvirflytan frá einum posti til annan ikki kann fara fram uttan greiniliga heimild til hetta í lógini. Landsstýrið hevur tó heimild til í einum tíðarskeiði av inntil 3 mánaðir, aftan á at figgjarárið er lokið, at ávísa pening, sum er játtaður í figgjarlóginí fyri farna árið.«

Endamálið við grannskoðanini hjá løgtingsgrannskoðarunum er ásett í § 3 í Ll. nr. 16 frá 26. aprfl 1965 um grannskoðan av landsins almennu roknskapum.:

»Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum hvørt árs roknskapir og ansa eftir, at allar inntøkur og útreiðslur eru komnar við inn í roknskapin og hereftir at ongin útreiðsla í landskassaroknskapinum er hildin, sum hevur ikki heimild í figgjarlóg ella aðrari játtanarlóg.

Løgtingsgrannskoðararnir skulu hava eyguni eftir, at tað hevur verið forsvarliga húsað í fyrisitingini av miðlum landsins og virkjum tess.«

Í § 4 er ásett, at:

»fyri beinleikan av tí, sum í roknskapinum stendur, hava løgtingsgrannskoðararnir rætt til at taka váttanir o.t. frá roknskapargrannskoðanini sum nóg gott prógv.«

2. *Yvirlit yvir rakstur 1989-1991:*

(mió.kr.)

	1989		1990		1991		
	Roknsk.	F-lóg	Roknsk.	F-lóg	Roknsk.	F-lóg	Eyka F-lóg
INNTØKUR:							
§ 1 Skattir	**1.281**	*1.310*	**1.144**	*1.220*	**988**	*1.050*	*1.050*
§ 2 Toll- og framleiðslugjøld	**957**	*1.108*	**785**	*1.003*	**762**	*803*	*768*
§ 3 Onnur gjøld	**17**	*12*	**14**	*16*	**4**	*2*	*3*
§ 4 Inntøkur av spæli	**1**	*1*	**1**	*1*	**1**	*1*	*1*
§ 5 Rentur & vinningsbýti v.m.	**+ 33**	*3*	**+ 121**	*+ 42*	**+ 130**	*+ 108*	*+ 126*
§ 6 Landsstovnar	**+ 58**	*+ 42*	**+ 78**	*+ 44*	**0**	*22*	*0*
§ 7 Partur av avlopi Danska Tjóðbankans	**21**	*15*	**0**	*20*	**34**	*20*	*20*
§ 8 Gjøld frá danska statinum	**730**	*749*	**752**	*764*	**771**	*785*	*785*
§ 9 Ymsar inntøkur	**-**	*-*	**-**	*-*	**3**	*1*	*1*
Samantaldar inntøkur	**2.916**	*3.156*	**2.497**	*2.938*	**2.433**	*2.576*	*2.502*
ÚTREIÐSLUR							
§ 10 Løgtingið	**16**	*15*	**16**	*16*	**17**	*15*	*16*
§ 11 Landsumsitingin	**160**	*157*	**152**	*149*	**169**	*155*	*169*
§ 12 Heilsumál	**411**	*401*	**359**	*354*	**361**	*349*	*356*
§ 13 Samferðslumál	**317**	*315*	**289**	*267*	**386**	*376*	*383*
§ 14 Skúlamál	**426**	*422*	**391**	*380*	**386**	*378*	*391*
§ 15 Vísind, bókmentir og list	**124**	*123*	**85**	*85*	**59**	*59*	*62*
§ 16 Fiskivinna, sigling o.t.	**601**	*425*	**547**	*536*	**539**	*522*	*526*
§ 17 Landbúnaður og matrikulering	**53**	*51*	**45**	*45*	**36**	*36*	*36*
§ 18 Handil, iðnaður v.m.	**52**	*50*	**46**	*43*	**47**	*48*	*48*
§ 19 Almannamál v.m.	**900**	*821*	**853**	*791*	**800**	*806*	*785*
§ 20 Pensjónsútreiðslur	**9**	*5*	**10**	*8*	**11**	*10*	*11*
§ 21 Effektivar veðhaldsbindingar	**105**	*105*	**80**	*80*	**167**	*170*	*170*
§ 22 Aðrar og óvissar útreiðslur	**6**	*6*	**7**	*6*	**7**	*7*	*7*
§ 23 At leggja í ymsar grunnar v.m.	**120**	*146*	**99**	*106*	**0**	*0*	*0*
§ 24 Burturleggingar til avdráttir av lánum	**5**	*4*	**0**	*4*	**0**	*0*	*0*
§ 25 Avskrivingar	**52**	*54*	**37**	*38*	**0**	*0*	*0*
§ 26 Ymsar ognarútreiðslur	**-**	*1*	**-**	*1*	**-**	*1*	*1*
§ 27 Reguleringskonto	**0**	*50*	**0**	*30*	**20**	*0*	*20*
Samantaldar útreiðslur	**3.357**	*3.151*	**3.016**	*2.939*	**3.005**	*2.932*	*2.981*
Rakstrarundirskot	**+ 441**	*+ 5*	**+ 519**	*÷ 1*	**+ 572**	*÷ 356*	*÷ 479*

3. *Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1989-1991:*

Fíggjarstøðan í landskassaroknskapunum til og við 1990 gevur ikki eina greiða og fullfíggjaða mynd m.a. orsakað av, at ein stórur partur av lánum, innistandandi í peningastovnum, útlánum, veðhaldsútleggum v.m. vóru skrásett í teim nógvu grunnunum. Ein stórur partur av hesum útlánum og veðhaldsútleggum vóru harumframt virðisleys. Vísandi til landskassaroknskapin fyri 1991 varð mett, at setast skuldu 1,4 mia.kr. av móti tapi av

landskassaútlánum, veðhaldsútleggum v.m., og at umleið 200 mió.kr. av skattaeftirstøðunum vóru virðisleysar.

Vísandi til omanfyristandandi ber tí ikki til at gera eitt greitt yvirlit yvir gongdina í fíggjarstøðuni, so sum hon er uppsett í landskassaroknskapunum áðrenn 1991.

Niðanfyri er gjørt eitt yvirlit, sum vísir innistandandi og skuld, íroknað grunnar, fyri árini 1987-1991:

(mió.kr.)

	1987	1988	1989	1990	1991
Innistandandi (íroknað grunnar)	466	369	366	391	239
Lán (íroknað grunnar og tvungna uppsparing)	÷ 437	÷ 493	÷ 1.018	÷ 1.584	÷ 2.163
Nettoogn/-skuld	÷ 29	÷ 124	÷ 652	÷ 1.193	÷ 1.924
Skrásettar veðhaldsskyldur	2.379	2.251	2.186	2.119	1.661

Ultimo 1987 var talan var um eina nettoogn excl. veðhaldsskyldur, sum tá vóru skrásettar til uml. 2,4 mia.kr.

Frá 1987-1991 vaks nettoskuld landskassans til umleið 2 mia.kr., men í hesum tíðarskeiði minkaðu veðhaldsskyldur landskassans við umleið 0,7 mia.kr., vegna tess, at landskassin í hesum tíðarskeiði hevur útgoldið munandi upphæddir av tí at veðhald gjørdust effektiv.

Nevnast skal tó, at skrásettu veðhaldsskyldur landskassans í stóran mun ikki hava verið eftirfarandi øll árini. Frá tí at tilsøgn um veðhald varð givið til landsstýrið undirskrivaði árit um landskassaveðhald á skuldarbrøvini gingu ofta fleiri ár, og í fleiri førum fekk gjaldstovan tá ikki boð um at skráseta veittu veðhaldini í veðhaldsyvirlitið.

Mett verður, at avtøkan av grunnunum, virðismetingin av aktivum og uppsetingin av fíggjarstøðuni í landskassaroknskapunum fyri 1991, við notum og viðmerkingum, geva roknskaparlesarum eina greiðari og meira fullfíggjaða mynd av fíggjarstøðuni í mun til undanfarin ár.

4. *Seinasta álit frá løgtingsgrannskoðarunum:*

Í sambandi við at landskassaroknskapirnir fyri 1985-1988 vórðu lagdir fyri løgtingið til góðkenningar, samtykti løgtingið 22. desember 1992 uppskot til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum dagfest 9. apríl 1992 við hesum viðmerkingum:

1. *Løgtingsgrannskoðararnir ásannaðu, at teir sjálvir ikki hava verið nóg aktivir á grannskoðanarøkinum seinastu árini, og áttu at fylgt tí arbeiðnum betri upp, tá gjørt varð. Tískil lá nógv arbeiði hjá nevndini niðurfyri.*

   Løgtingsgrannskoðararnir hava síðani tilevnað uppskot til nýggja grannskoðanarlóggávu

viðvíkjandi almennum roknskapum, sum er lagt fram av formansskapi Føroya Løgtings og beint í fíggjarnevndina.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla fíggjarnevndini til at útseta viðgerðina av lógaruppskotunum til komandi tingsetu, og mæla til, at umskipanin av grannskoðanini fær gildi frá 1. januar 1995.

Grundgevingin fyri hesum er, at løgtingsgrannskoðararnir í hesi tingsetu hava lagt stóra orku í at leggja landskassaroknskapirnar fyri 1989-1991 fyri tingið, umframt flest allar teir størru almennu roknskapirnar fram til 1992.

Løgtingsgrannskoðararnir meta tað vera rættast, at teir við verandi lóggávu fáa høvi at koma heilt uppundan við arbeiði teirra, soleiðis at eitt nýtt løgting kann fara undir eitt dagført løgtingsgrannskoðaraarbeiði frá byrjan við nýggjari lóggávu. Løgtingsgrannskoðararnir meta eisini, at við at útseta viðgerðina av uppskotunum til komandi tingsetu, verða betri stundir at avklára og viðgera ymsar tvaspurningar, eins og betri stundir verða at fyrireika ta nýggju skipanina.

2. *Átalað varð, at øll sitandi landsstýri síðani fíggjarárið 1982/83 ikki hava yvirhildið grein 21 í stýrisskipanarlógini, og ikki tikið stig til at fáa hesi viðurskifti í rættlag, hóast nógvar átalur og áheitanir. Eisini varð átalað, at landsstýrið í nógvum førum als ikki svarar fyrispurningum ella tekur sær tykni av viðmerkingum og áheitanum frá roknskapargrannskoðanini og frá løgtingsgrannskoðarunum og harvið eisini frá løgtinginum.*

3. *Fegnast varð um tey stig, sum eru tikin til at bøta um mannagongdina viðvíkjandi fíggjarviðurskiftunum, so sum ger av eykafíggjarlóg í 1991, avtøka av teim flestu landskassagrunnunum og lóg nr. 116 frá 20. desember 1991 um heimild til lán/nýtslu (løgtingsmál nr. 39/1991).*

4. *Átalað varð, at landsstýrið ikki hevði sýnt neyðugt fíggjarligt umhugsni viðvíkjandi útlána- og veðhaldsvirksemi landsins. Í alt ov stóran mun hevði landsstýrið umsitið givin lán og veðhald, uttan at fylgja nóg væl við og taka neyðug stig mótvegis lántakarum, ið ikki halda sínar skyldur. Hetta hevur munandi økt um landskassans tap, og viðført stórar meirrentur, og verið til skaða fyri og forðu eini menning av tí partinum av vinnuni, ið hevur roynt at hildið sínar skyldur og bygt á eitt umhugsað grundarlag.*

5. *Løgtingsgrannskoðararnir mettu, at ein stórur partur av aktivunum, ið stóðu í landskassaroknskapunum, einki virði høvdu, og áløgdu landsstýrinum at taka stig til eina upprudding á hesum øki.*

   Løgtingsgrannskoðararnir fegnast um, at landsstýrið í 1992 tók stig til eina virðismeting av hesum aktivum, og at úrslitið er tikið við í landskassaroknskapin fyri 1991.

6. *Viðvíkjandi landskassaroknskapinum varð álagt landsstýrinum at áseta grundleggjandi roknskaparprinsippir á rýðandi økjum, so sum avskrivingar/avsetingar móti tapi, virðismeting, veðhaldsskyldur, kurstap/vinning, bólking av status o.s.fr., og at hetta verður gjørt í samband við, at tað eisini verða ásettar nærri reglur fyri uppsetan av ársroknskapi hjá teim almennu stovnunum/grunnunum.*

Løgtingsgrannskoðararnir fegnast um, at landsstýrið í 1993 legði fram uppskot um lóg um landsins almenna roknskaparhald v.m., sum nú er samtykt og fær gildi frá 1. januar 1995. Men lógin er bert 1. stig í hesum arbeiði.

7. *Mælt verð landsstýrinum til sum skjótast at taka stig til ein samskipaðan edv-politikk, har hugsað verður fleiri ár fram, og at støða í til sambandinum verður tikin til, hvussu framtíðar roknskaparhald og fíggjarstýring eigur at skipast, og hvussu bygnaðurin skal broytast.*

   Løgtingsgrannskoðararnir eru kunnaðir um, at landsstýrið hevði tikið stig til ein samskipaðan edv-politikk, og at nógv kanningararbeiði er gjørt á hesum trupla øki, men mett verður ikki at komið er nóg langt ávegis.

8. *Mælt verð landsstýrinum til at endurskoða og broyta kunngerðina um tollkreditt, so tapini á hesum øki framyvir gerast minni. Í hesum sambandi verð mælt til, at heimild verð givin til at nokta at útflýggja vørur, fyrr enn gjaldkomin skuld til tollvaldið er goldin. Í sambandi við komandi MVG-skipan verð mælt til stórt varsemi og umhugsni viðvíkjandi kreditti og innkrevjing.*

   Mett verður, at landsstýrið als ikki hevur tikið nøkur stig á hesum øki.

5. <u>Roknskapargrannskoðanin/viðmerkingar:</u>

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið grannskoðanarfrágreiðingina frá Grannskoðanardeild Landskassans og løgtingsins statsautoriseraða grannskoðara fyri 1989-1991, og er henda viðløgd sum fylgiskjal til hetta løgtingsmál. Í sambandi við at løgtingsgrannskoðararnir ikki áður hava fingið serligar frágreiðingar um gjøgnumgongd av veittum veðhaldum/veðhaldsútleggum, heittu løgtingsgrannskoðararnir á grannskoðanina um at leggja serligan dent á at grannskoða hetta øki, umframt serlán og upphøggingarstuðul.

Niðanfyristandandi verður í stuttum tikið samanum viðmerkingarnar frá roknskapargrannskoðanini:

1. Meirnýtsla
2. Skúlamál
3. Upphøggingarstuðul
4. Serlán
5. Almannamál
6. Lóg nr. 13/1967 um veðhald fyri prioritetslánum
7. Veðhald-/veðhaldsútlegg fyri lánum til fiskiskip
8. Veðhald fyri lánum til flakavirkir
9. Veðhald fyri lánum til onnur virkir
10. Veðhald fyri lánum til kommunur
11. Veðhald fyri láni til P/F Atlantic Airways
12. Veðhald fyri lánum til IRF
13. Innkrevjing
14. Búskaparráðið
15. Ymsir grunnar

1. Meirnýtsla:

Viðvíkjandi fíggjarárunum 1989 og 1990

Sambært fíggjarløgtingslógini fyri **1989** varð mett, at talan fór at verða um eitt rakstraryvirskot uppá 5,7 mió.kr., men sambært landskassaroknskapinum gjørdist undirskotið 441 mió.kr., ein munur uppá 446 mió.kr.

Inntøkurnar vórðu 240 mió.kr. lægri enn mett.

Útreiðslurnar vórðu 206 mió.kr. hægri enn mett. § 21, effektivar veðhaldsbindingar, vísir eina nýtslu uppá 105 mió.kr., men skrásettu nettoveðhaldsútreiðslurnar í veðhaldsgrunninum vórðu 288 mió.kr., 183 mió.kr. hægri enn fíggjarlóg/rakstrarroknskapurin vísir.

Sambært fíggjarløgtingslógini fyri **1990** varð mett, at talan fór at verða um eitt rakstrarundirskot uppá 0,6 mió.kr., men sambært landskassaroknskapinum gjørdist undirskotið 519 mió.kr.

Inntøkurnar vórðu 441 mió.kr. lægri enn mett.

Útreiðslurnar vórðu 77 mió.kr. hægri enn mett. § 21, effektivar veðhaldsbindingar, vísir eina nýtslu uppá 80 mió.kr., men skrásettu nettoveðhaldsútreiðslurnar í veðhaldsgrunninum vórðu 170 mió.kr., 90 mió.kr. hægri enn fíggjarlóg/rakstrarroknskapurin vísir.

Um meirnýtslan á § 21 verður tikin við, so er samlaða rakstrarundirskotið í fíggjarárunum 1989 og 1990 góðar 1,2 mia.kr. í mun til fíggjarløgtingslógirnar hesi bæði árini, sum so at siga javnvigaðu, tá tær vórðu samtyktar.

Í mun til árini frammanundan, er meirnýtslan sum heild í 1989 og 1990 í teim nógvu grunnunum ikki so stór, burtursæð frá veðhaldsgrunninum, har meirnýtslan var 273 mió.kr.

Ikki allar eykajáttanir eru skrásettar í landskassaroknskapinum. Grannskoðanin hevur gjøgnumgingið gerðabøkurnar hjá fíggjarnevndini og tær lógir í fíggjarárinum, sum viðvíkja eykajáttanum.

Í grannskoðanarfrágreiðingini er eitt yvirlit yvir bruttomeirnýtsluna í 1989 og 1990 í mun til játtan á fíggjarlóg og eykajáttanir frá fíggjarnevndini ella sambært løgtingslógum fyri tey einstøku rakstrarstøðini. Fyri bæði fíggjarárini er talan um eina bruttomeirnýtslu uppá uml. 400 mió.kr. í alt.

Tær størstu meirnýtslurnar hesi bæði árini eru á hesum økjum:

	(mió.kr.)
- Almannamál	160
- Rentuútreiðslur	131
- Strandferðslan (fekk »eykajáttan« í 1991)	25
- Skúlamál	19
- Heilsumál	14

Viðvíkjandi skúlamálum kann nevnast, at tað sum er skrásett sum nýtsla hjá teim teknisku skúlunum ikki er tað, sum er brúkt sambært ársroknskapunum hjá skúlunum tey einstøku árini.

Játtanarviðurskiftini á fiskivinnuøkinum eru nærri lýst í álitinum frá løgtingsgrannskoðarunum dagfest 16. februar 1994 um roknskapirnar hjá Lønjavningar- og Ráfiskagrunninum.

Viðvíkjandi fíggjarárinum 1991

Í 1991 verða játtanarviðurskiftini munandi broytt, flestu landskassagrunnarnir vórðu avtiknir og ein eykafíggjarlóg varð samtykt fyri 1991.

Viðvíkjandi meir-/minninýtslu samanborið við játtan kann tí vísast til roknskapin fyri 1991, har roknskapartølini eru sett upp í mun til játtanirnar á eykafíggjarlógini fyri 1991.

Samlaðu inntøkurnar gjørdust 69 mió.kr. minni enn mett og útreiðslurnar 24 mió.kr. størri, netto.

Í mun til árini frammanundan eru frávikini í 1991 munandi minni. Tær størstu meirnýtslurnar viðvíkja almannamálum, fiskivinnu og sjúkrahúsverkinum.

Í sambandi við at landskassagrunnarnir vórðu avtiknir kann nevnast, sum vist í landskassaroknskapinum fyri 1991, at fram til 1990 høvdu hesir 4 grunnar havt ta størstu meirnýtsluna:

	(mió.kr.)
- Grunnur móti tapum av lánum og veðhaldum	290
- Grunnur til fiskiskipaupphøgging	48
- Grunnur til berghol og brúgvagerð	34
- Grunnur til sjúkrahúsbygging	13

2. Skúlamál:

Viðvíkjandi **fólkaskúlanum** verður mett, at skipanin, sum nýtt verður at stýra fíggjarviðurskiftum fólkaskúlans, tykist vera væl umsitin. Mælt verður til at gjørdur verður ein samanskrivaður lønarsáttmáli. Gjørt verður vart við at stórur vandi er fyri, at vanligt viðlíkahald av skúlunum í ávísum førum verður spart burtur, og kann hava við sær munandi størri útreiðslur seinni. Somuleiðis tykist nógv spart uppá undirvísingartilfar, sum eisini er ein kommunal uppgáva.

Viðvíkjandi **Suðuroyar HF-skeið v.m.** verður vist á, at í skúlaárinum 1991-92 var talan um sera nógvar yvirtímar. Eins og viðvíkjandi **Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna** og **Føroya Sjómansskúla**, varð mælt landsskúlafyrisitingini til at taka stig til at avklára ymsar smærri spurningar viðvíkjandi m.a. lønar-/og sáttmálaviðurskiftum, sum reistir vórðu.

3. Upphøggingarstuðul:

Upphøggingarstuðulin, sum varð veittur eftir reglugerð nr. 27 frá 3. mai 1988, var uppá 92 mió.kr. til 22 skip. Vist verður á, at henda skipan var sera trupul at umsita, og at stuðulin

í fleiri førum ikki varð veittur í tráð við reglugerðina. Fleiri av teimum skipum, ið fingu upphøggingarstuðul, vóru ella vórðu um at verða løgd av fíggjarligum og øðrum orsøkum, og fiskiskapurin hevur m.a. tí í fleiri førum ikki verið tann heilt stóri, og upphøggingarstuðulin til fleiri av hesum skipum kostaði tí serliga nógv í mun til skip, ið høvdu verið í vanligum rakstri. Endamálið hjá landsstýrinum hevur tí helst verið at fáa aftur fiskiloyvi heldur enn at minka um veiðutrýstið í fyrstu atløgu.

Upphøggingarstuðul samb. løgtingslóg nr. 46 frá 30. mars 1990 varð veittur til 33 skip, sum fingu útgoldið falt uml. 182 mió.kr. eftir hesi lóg. Henda upphøggingarskipan var munandi lættari at umsita, eftirsum stuðul varð veittur í mun til, hvussu nógv skipini høvdu fiskað seinastu árini. Grannskoðanin hevur uttan stórvegis viðmerkingar gjøgnumgingið nakrar av hesum útrokningum.

4. Serlán:

Løgtingslóg nr. 41 frá 21. mai 1988 um lán/serlán til fiskifør heimilar landsstýrinum saman við Fíggjarnevndini at nýta upp til 150 mió.kr. til at bøta um rakstrargrundarlagið hjá fiskiførum. 67 skip fingu í tíðarskeiðinum 1988-91 útgoldið falt 125 mió.kr.

Sambært kunngerð nr. 48, frá 26. mai 1988, eru nærri treytir settar fyri lánsveiting eftir hesi lóg.

Sambært kunngerðini ger landsumsitingin tilmæli viðvíkjandi innkomnum umsóknum, og kann hon taka sær serkøna hjálp í viðgerðini. Til at málsviðgera serlánini varð sett ein serlig nevnd við umboðum frá fiskivinnuumsitingini, Lønjavningar- og Ídnaðargrunninum og P/F Føroya Banka.

Endamálið við grannskoðanini hevur verið at meta um lánini eru veitt til tað endamál og eftir teimum treytum, ið ásettar eru í lógini og í kunngerðini. 15 skip eru tilvildarliga vald út, og fyri hvørt skip er kannað eftir, um treytirnar fyri at fáa lán, sambært lógini um serlán og kunngerðini, eru uppfyltar.

Ein treyt í kunngerðini er, at umsøkjarin skal geva gjølligar upplýsingar um, hvussu raksturin kann gerast lønandi. Hesar upplýsingar eru bert í helmingunum av sakunum. Annars eru viðlagdar rakstrarætlanir, sum flestar eru uppsettar av grannskoðarum. Ivi kann vera um, hvussu realistiskt hesar eru uppsettar. Dømi eru tví- og trífalding av søluni við støðugum ella minkandi útreiðslum hóast økta veiðu.

Upplýst er, at serlánsnevndin ikki legði dent á hesar upplýsingar, sum teir mettu onki virði høvdu.

Har talan er um partafeløg er ein treyt, at eginpeningurin skal hækkast við 10% av tí peningi, ið veittur verður sum serlán. Viðvíkjandi partsreiðaríum og í øðrum førum verður kravt, at eginpeningurin verður hækkaður við 20% av veitta láninum.

Tá talan er um partafeløg, er váttan frá umsøkjara ella banka um, at eginpeningurin er hækkaður, ella at banki váttar at viðkomandi felag hevur inngoldið eina ávísa upphædd á bók í bankanum. Í fleiri førum er, sambært partafelagskránni, samsvarandi hækkan av

partapeningi ikki síðani skrásett. Tá talan er um partsreiðarí o.l. er í tveimum førum inngoldið 10% fstaðin fyri 20%.

Fleiri av skipunum vóru sera illa fyri fíggjarliga við stórari lánibyrðu. Hóast ongar avskrivingar vóru gjørdar, var í nærum øllum førum talan um negativa eginogn umframt stóra gjaldkomna skuld. Men bert í einum føri er í roknskapinum tikið fyrivarni fyri framhaldandi rakstri.

Ein treyt í kunngerðini er, at grundarlag skal vera fyri at halda, at farið, við tí serláni sum verður veitt, verður ført fyri at bera seg fíggjarliga. Við at gjøgnumganga roknskapartilfarið hjá skipunum sæst, at fleiri av hesum longu tá neyvan høvdu nakran møguleika fyri at bera seg fíggjarliga, hóast hesi fingu serlán, og í tveimum førum hevur serlánsnevndin viðmælt umsóknir, sum Búskaparráðið stutt áðrenn hevði mælt frá at veita kreppulán/veðhald, við tí grundgeving at tað ikki var nakar møguleiki fyri at fáa skipini at bera seg fíggjarliga.

Við at kanna heildartilmælini sæst, at nøkur skip hava fingið útgoldið serlán, hóast serlánsnevndin hevur gjørt vart við, at »ongin vón« er fyri framhaldandi rakstri.

Nevnast kann, at í fíggjarnevndini var ynski um eisini at fáa øll tey mál, har tað var mett, »at ongin vón er fyri viðkomandi skipi«, og biðið varð seinni um, at øll mál viðvíkjandi serlánum komu fram til fíggjarnevndina, so nevndin kundi fáa trygd fyri eins viðgerð, og fíggjarnevndin játtaði serlán til fleiri skip »uttan vón«.

5. Almannamál:

Ein av høvuðsniðurstøðunum í grannskoðanarfrágreiðingunum fyri 1990 og 1991 fyri tann partin av almannaútreiðslunum, har talan er um ríkisendurgjald er, at arbeiðsorkan bæði í landsstýrinum og á Almannastovuni hevur verið ov lítil, og at ein stórur partur av trupulleikunum á almannaøkinum óivað standast av hesum.

Í grannskoðanarfrágreiðingunum verður víst á, at grannskoðanin síðani heimastýrið yvirtók umsitingina av almannamálum ikki hevur verið nøktandi, og at ein partur av trupulleikunum standast av, at danskir og føroyskir myndugleikar m.a. av hesi orsøk ikki hava havt nóg gott innlit í umsitingina av hesum øki.

Mett verður, at høvuðstrupulleikin viðvíkjandi lógargrundarlagnum er, at skiftandi landsstýri ikki í nóg stóran mun hava tikið stig til neyðugar dagføringar av almannalóggávuni og m.a. ikki tikið stig til neyðuga samskipan við aðra lóggávu, harundir skatta- og skrásetingarlóggávu, og at Almannastovan tí hevur verið noydd at umsita út frá einum lógargrundarlagi, sum á nøkrum økjum ikki hevur verið tíðarhóskandi og á øðrum økjum í veruleikanum ógjørligt at umsita.

Sum frá er liðið er á fleiri økjum vorðin alt størri munur miltum lógarorðing og praksis. Viðmerkjast skal tó, at Almannastovan, tá mett hevur verið at innihaldið í galdandi lóggávu hevur verið ógreitt, í summum førum hevur nýtt danskan praksis (t.d. bistandsloven) vegleiðandi, og hevur Sosialmálaráðið í flestu av hesum førum eftirfylgjandi góðkent hetta. Henda støðan tykist tó heldur ósambærlig við endamálið hjá løgtinginum við at yvirtaka umsitingina.

Ein meginregla í verandi almannalóggávu er, at ognar- og inntøkuviðurskifti hjá viðskiftafólki eru avgerandi fyri støddina av almannaveitingunum.

Í eini frágreiðing frá Toll- og Skattstovu Føroya í oktober 1993 um kanning av ognaruppgerðini verður sagt frá, at gongdin viðvíkjandi ognaruppgerðum hevur verið tann, at sum fráleið vórðu tað minni enn helvtin av skattaborgarunum, ið sendu ognaruppgerðir inn, og at líkningarráðið í 1989 avgjørdi, frá 1990 at rokna, at krevja allar ognaruppgerðir inn. Við støði í eini kanning í juni 1992 av 762 ognaruppgerðum, tilvildarliga valdar út, varð mett, at upplýsingar um innistandandi og skuld, sum Toll- og Skattstova Føroya fær frá pengastovnum, eru alt ov ófullfíggjaðir til, at stovnurin kann grunda sítt arbeiði á teir. Eisini noyðist stovnurin at taka fyrivarni fyri rættleikanum av teim ognarupplýsingum, stovnurin veitir Almannastovuni.

Nevnast kann í hesum sambandi, at ein arbeiðsbólkur, ið landsstýrið í september 1993 setti at endurskoða og gera tilmæli viðvíkjandi tillaging av ognar- og inntøkuupplýsingunum í skatta- og almannalóggávuni, í eini frágreiðing frá november 1993 vísti á so nógvar ivaspurningar, at arbeiðsbólkurin skeyt upp, at seta ein annan skjóttarbeiðandi arbeiðsbólk at halda fram við hesum arbeiði, og at koma við uppskoti um broytingar í pensjónslógunum sum heild, við tí endamáli at fáa eina einfalda og nútímans pensjónslóggávu, sum kann umsitast við verandi starvsfólkatali. Grundgevingarnar fyri hesum vóru m.a., at lógirnar í verandi líki eru truplar, og í summum førum nærum ómøguligar at umsita. Hetta kemst av, at tær 1) eru gamlar (frá 50-árunum) og tí ikki í øllum førum hóska til samfelagið í dag, 2) ongantíð hava verið fyri grundleggjandi endurskoðan, og 3) tíðum bert eru broyttar smávegis. Úrslitið er, at sosialu lógirnar ikki longur eru samanhangandi, hvørki sínámillum ella við aðrar lógir, eitt nú skattalógina. Somuleiðis varð heitt á landsstýrið um at taka støðu til ávísar grundleggjandi aðalreglur og endamál við eini nýggjari lóggávu.

Í grannskoðanarfrágreiðingunum fyri 1990 og 1991 varð mælt til eitt greiðari uppgávubýti millum landsstýrið og Almannastovuna. Í sambandi við yvirtøkuna av umsitingini varð í kunngerð nr. 5 frá 25. mars 1975 ásett, at Almannastovan skuldi hava tær uppgávur um hendi, sum vóru lagdar til »landsstyrets socialforvaltning«. Tað vil fyrst og fremst siga uppgávur í mun til viðskiftafólkið. Ásett varð, at aðrar uppgávur kunnu leggjast til Almannastovuna við lóg, løgtingslóg ella avgerð frá landsstýrinum, og at landsstýrið kann gera reglur fyri virkseminum hjá Almannastovuni. Slíkar reglur eru ikki gjørdar, og tí er ikki greitt, í hvønn mun Almannastovan skal hava aðrar meira yvirordnaðar uppgávur (í sambandi við ráðlegging, fyrireiking av lóggávu v.m.). Tað má metast, at partur av teim umsitingarligu trupulleikunum standast av tí ógreiða uppbýti millum landsstýrið og Almannastovuna, og t.d. var hetta ógreiða uppgávu- og ábyrgdarbýti helst ein av orsøkunum til trupulleikarnar við at halda tær avtalur, ið vórðu gjørdar við Sosialmálaráðið. Mælt er landsstýrinum til at greiða hesi viðurskifti, áðrenn støða verður tikin til broytingar í bygnaðinum á Almannastovuni.

6. Lóg nr. 13/1967 um veðhald fyri prioritetslánum:

Í sambandi við gjøgnumgongd av veðhaldum fyri prioritetslánum til fiskiskip, har tilsøgn um veðhald eru givin áðrenn lóg nr. 102/1988 kom í gildi í august 1988, verður í teimum førum, har víst verður á lógarheimild, víst til lóg nr. 13/1967:

§ 1 Landsstýrinum er heimilt saman við fíggjarnevndini landskassans vegna at ganga

í veð fyri prioritetslánum til nýbygd fiskiskip. Hetta veðhald má tilsamans ikki fara uppum 50 mió.kr.

§ 2 Henda lóg kemur í gildi beinanvegin og verður at endurskoða í løgtingssetuni 1969.

Í einum notati dagfest 7. januar 1982, sum fyrrverandi skrivstovustjórin í landsstýrinum hevur gjørt viðvíkjandi innheintan av peningakrøvum landskassans í sambandi við fiskiskip, stendur viðvíkjandi veðhaldum fyri prioritetslánum í nýbygdum fiskiskipum, Ll. nr. 13/1967:

»Eitt mark er í lógini sett fyri einkulta lánið og heldur ikki krav um, hvussu tað skal tryggjast. Vanliga markið í praksis er, at hámarkið er 14% av metingarvirðinum, og at lánið, ið veðhildið verður fyri, hevur prioritet í skipinum innanfyri 70% av virðinum. (Lógin eigur at endurnýggjast, hon hevur eitt (akkumulerað?) mark uppá 50 mió.kr. og skuldi endurskoðast í tingsetuni 1969). Lógin er serliga nýtt við skipabygging í Noregi«.

Nevnast kann, at givnar tilsøgnir í 1982/83 um veðhald fyri prioritetslánum (oftast 25% í hesum tíðarskeiði), einsamallar vóru nóg stórar til at náa markið í lógini, til dømis »fylti« bara tað eina skipið nærum 50% av markinum.

Í einum øðrum notati dagfest 9. mars 1987, sum fyrrverandi skrivstovustjórin í landsstýrinum hevur gjørt um hetta mál, í sambandi við at aðrir løgfrøðingar í landsstýrinum høvdu gjørt vart við, at ongin lógarheimild var at veita veðhald fyri prioritetslánum, stendur m.a.:

»Nú kann sigast, at 1967-lógin er galdandi enn, tað man tó vera meira enn ivasamt og sjálvt um so skuldi verið, er farið upp um markið 50 mió.kr. ikki bert eina ferð, men fleiri ferðir. Hóast hesa tørvandi heimild, hava bæði landsstýrið og figgjarnevnd játtað veðhald fyri prioritetslánum og veðhaldsumsóknir til nýbyggingar liggja fyri.

Mælt verður tí til at fáa veðhaldsheimildina endurnýggjaða.«

Tað er ilt at meta um í hvønn mun og á hvønn hátt heimildarspurningurin viðvíkjandi lóg nr. 13/1967 er viðgjørdur áðrenn 1987.

Í 1987 vórðu stig tikin til nýggja lóggávu viðvíkjandi prioritetslánum til fiskiskip, og legði landsstýrið fram uppskot hesum viðvíkjandi í mars 1988 (lóg nr. 102/1988).

Vísandi til omanfyristandandi áttu stig óivað at verið tikin til at endurnýggja Ll. nr. 13/1967 longu í 1982, og ilt er at meta um, hví so nógv ár gingu áðrenn nýggj lógarheimild varð samtykt, og í hvønn mun landsstýrið síðani 1982 vísti ella átti at vitað, at heimildin í Ll. nr. 13/1967 var uppbrúkt, og somuleiðis er ilt at meta um, í hvønn mun figgjarnevndin er ella átti at verið kunnað av landsstýrinum um henda lógarheimildarspurning, vísandi til tað sum er ført fram av fyrrverandi skrivstovustjóra á landsskrivstovuni.

Øll veðhald fyri prioritetslánum til fiskiskip, ið eru gjøgnumgingin, eru samtykt av Figgjarnevnd Føroya Løgtings.

7. Veðhald-/veðhaldsútlegg fyri lánum til fiskiskip:

12 av veðhaldunum/veðhaldsútleggunum viðvíkjandi fiskiskipum eru gjøgnumgingin, talan er um nøkur av teim størstu, og nøkur eru tilvildarliga vald út.

Viðvíkjandi veðhaldum fyri lánum til fiskiskip, stuðulslán v.m. kann nevnast, at tá ræður um nýbygging, eru flest allar tilsøgnir upprunalig givnar av landsstýrinum/fíggjarnevndini áðrenn 1987

Síðani eru fleiri av hesum veðhaldum og lánum hækkað, vísandi til at byggiprísurin bleiv hægri enn fyrst mett.

Umstøðurnar í sambandi við trý tey størstu veðhaldsútleggini eru meira nágreiniliga lýstar:

- bygginummar 53 á Skála Skipasmiðju
- bygginummar 46 á Skála Skipasmiðju
- Reynsatindur/Olaf í Garðastovu

og harumframt er nærri greitt frá tá veðhald v.m. vórðu veitt í sambandi við bygging av Stígarkletti og Hádegiskletti. Hini skipini verða viðgjørd undir einum.

Nevnast kann, at veðhaldsútlegg vegna bygginr. 53 og nr. 46 v.m. á Skála Skipasmiðju, eru skrásett soleiðis:

	(mió.kr.)	
	BRUTTO	NETTO
Bygginummar 53	144	59
Felagsútreiðslur	22	15
Bygginummar 46	98	71
falt	264	145

- **Bygginr. 53 á Skála Skipasmiðju:**

Nettoútlegg/tap landskassans viðvíkjandi bygginr. 53 kann uppsetast soleiðis:

	(mió.kr.)
Bruttoútlegg pr. ultimo 1991	144
Inngoldið frá Realinum	÷9
Inngoldið frá Danmarks Skibskreditfond	÷57
Vanligt stuðulslán	÷10
»Eyka« stuðulslán	÷9
Veðhaldsútlegg/netto	59

Við útgangsstøði í teim útreiðslum, ið beinleiðis eru bókaðar á bygginr. 53, sammett við tað ið er útgoldið av byggiláni, kann tap landskassans nærri útgreinast soleiðis:

	(mió.kr.)
Partur av byggiláni, brúkt til annað endamál	38
Tap við sølu (munur ímillum søluprís og skrásettan kostprís)	9

Rentur, byggilán	12
Veðhaldsútlegg/netto	59

Í sambandi við bygging/fíggjan av skipinum var falt talan um hesar útleggs-, láns-, veðhalds- og stuðulsupphæddir úr landskassanum, umframt »felagsútreiðslur« uppá 15 mió.kr.:

	(mió. kr.)
Veðhaldsútlegg/netto	59
Veðhald fyri prioritetsláni	19
Stuðulslán	10
»Eyka« stuðulslán	9
Rentustudningur	14
Likviditetslán	5
Toll- & fraktendurgjald	10
	126

- **Felagsútreiðslur:**

Umframt tíma- og mánaðarlønir, sum vórðu bókaðar sum felagsútlegg, falt góðar 12 mió.kr., var talan um einar 10 mió.kr., sum harumframt vórðu nýttar til rakstur av skipasmiðjuni, keyp av tilfari í sambandi við umvælingar v.m. Bruttoútreiðslurnar til felagsútreiðslur vóru falt 22,4 mió.kr., og skrásettar inntøkur uml. 7,8 mió.kr. Nettotap landskassans skrásett sum felagsútreiðslur var sostatt uml. 14,6 mió.kr. Eftirsum so at siga onki var gjørt við bygginr. 46 má sigast, at hesar útreiðslur óbeinleiðis hava samband við at gera bygginr. 53 lidnan.

- **Bygginr. 46 á Skála Skipasmiðju:**

Tá skipasmiðjan kom í likviditetstrupulleikar fyrst í 1988, vóru einar 70 mió.kr. bókaðar sum nýttar til skipið, og svaraði hetta á leið til tað, ið útgoldið var av byggilánunum, tá tær góðar 8 mió.kr., sum fluttar vóru av byggilánum til eina, seinni tvær konti í Fossbankanum, verða tiknar við.

Árini 1988, 1989 og 1990 vóru nýttar ávikavist 1,7 mió.kr., 1,8 mió.kr. og 0,5 mió.kr., falt einar 4 mió.kr. beinleiðis til bygginr. 46, mest útreiðslur til at hava skipið liggjandi.

Nettoútlegg/tap landskassans viðvíkjandi bygginr. 46 kann uppsetast soleiðis:

	(mió.kr.)
Bruttoútlegg pr. ultimo 1991	98
Søla, netto	+ 27
Útl egg/netto	71

Við útgangsstøði í teim útreiðslum, ið beinleiðis vóru bókaðar á bygginr. 46, sammett við tað, ið var útgoldið av byggiláni, kann tap landskassans nærri útgreinast soleiðis:

	(mió.kr.)
Partur av byggiláni bókað til annað endamál	1
Tap við sølu (munur ímillum søluprís og skrásettan kostpris)	46
Byggirentur	16
Partur av byggiláni (síðsta rata) í Fossbankanum útgoldin til búgvið	8
	71

Í sambandi við, at skipasmiðjan fór í likvidatión, vóru tær 8-9 mió.kr. í Fossbankanum, sum sambært avtalu/ratuplani og ársroknskapinum vóru bundnar uppá byggilánið, fluttar á konto hjá búnum.

- **Reynsatindur/Olaf í Garðastovu:**

Í 1989 legði landskassin út 12,4 mió.kr. vegna veðhaldsskyldur mótvegis P/F í Garðastovu viðvíkjandi ávikavist vøruláni til svartkjaft, makrel, høgguslokk og síld á goymslu (10,3 mió.kr.) og útgerðarlán (2,1 mió.kr.).

Í sambandi við kanningina av hesum veðhaldsútleggum hevur roknskapargrannskoðarin gjøgnumgingið alt málið viðvíkjandi skipinum M/S Olaf í Garðastovu (P/F í Garðastovu) - áður M/S Reynsatindur (P/F Atlantic Trawlers). Henda gjøgnumgongd hevur vist, at tað samlaða tapið hjá landskassanum í sambandi við umbygging og rakstur av skipinum var o.u. **131,7 mió.kr.** sum hava ávirkað landsroknskapin á fylgjandi hátt:

	(mió.kr.)
Standa eftir sum veðhaldsútlegg fyri P/F í Garðastovu	79,3
Restskuld á seljarapantibrævinum (P/F í Garðastovu)	8,9
Avskrivað í 1987 (veðhaldsútlegg/stuðulslán til P/F Atlantic Trawlers)	22,5
Avskrivað í 1989 (rentuútreiðslur/kurstap landskassans v.m.	16,4
Surimi-verksmiðja	4,6
Í alt	131,7

Frá desember 1985 til medio 1987 fóru útgjaldingar fram/ávikavist øktust landskassans skyldur við tilsamans uml. 109,5 mió.kr., eins og inngjald til landskassan uppá 81,8 mió.kr. ikki vórðu bókað fyrr enn í august 1987.

- **Stígarklettur og Hádegisklettur:**

Í 1986 játtaðu landsstýrið og fíggjarnevndin 20% í veðhaldi fyri prioritetslánum, í sambandi við bygging av omanfyrinevndu trolarum á Tórshavnar Skipasmiðju, við støði í einum sáttmálaprísi uppá 32 mió.kr. fyri hvønn.

Uppií prísinum vóru fyri hvønn av trolarunum íroknaðar 9 mió.kr. reiðarínum at ráða yvir til fiskireiðskap og byggirentur:

Veðhald (20%), stuðulslán (10%) og rentustudningur (15%) vórðu veitt við støði í einum byggikostnaði uppá 33 mió.kr. Farmagjaldsstudningur (4,5%) og tollendurgjald (16%) vórðu veitt við støði í eini virðismeting uppá ávikavist 35,1 mió.kr. og 35,9 mió.kr.

Sambært ársroknskapunum var byggikostnaðurin umr. 30 mió.kr. og heitt er á landsstýrið um at biðja um eina frágreiðing um tær ymsu virðisásetingarnar.

- **Onnur fiskiskip:**

Umframt omanfyrinevndu veðhald eru veðhald veitt 7 øðrum skipum, gjøgnumgingin. Talan er um hesi skip feløg:

P/F Rógvutangi (Brestir)
P/F Borgarknappur (Polarborg I)
P/F Hamar (Saturn)
P/R Sjeystjørnan (Nesbúgvin)
P/F Ranin (Arctic Prawns)
P/F Fuglatúgvan (Fuglatúgvan)
P/F Samvinnufelagið (Høgifossur)

Roknskapargrannskoðanin hevur kunnað fiskivinnuumsitingina og búskapardeildina nærri um úrslitið av grannskoðanini og viðgjørt tilfarið á fleiri fundum:

Viðmerkingar:

1. Viðvíkjandi veðhaldum fyri prioritetslánum vísir landsstýrið í flestu førum til Ll. nr. 13/67 í áritum um landskassaveðhald, og í nøkrum førum verður ikki víst til lógarheimild. Allar tilsagnir um veðhald vórðu góðkendar av fíggjarnevndini.

2. Mett verður at tað er ivasamt um vísast kann til Ll. nr. 24/1978, tá landsstýrið í áttatiárunum í fleiri førum undirskrivaði nýggj veðhald fyri eftirstøðum og falnari skuld viðvíkjandi lánum við landskassaveðhaldi, sum áttu at verið fult afturgoldin og sum upprunaliga vórðu veitt í sjeytiárunum við heimild í t.d. Ll. nr. 30/1970, Ll. nr. 63/1975 og Ll. nr. 38/1976.

   Hetta fyribrigdi tykist vera ein avleiðing av, at innkrevjingin bæði í sjeyti- og áttatiárunum ikki hevur verið nøktandi, og at landsstýrið á henda hátt hevur endurnýggjað »pantivirðið« í viðkomandi skipi í sambandi við at nýggj lán/veðhald framhaldandi vórðu veitt m.a. í sambandi við nógvar umbyggingar.

3. Viðvíkjandi eftirkannan av um eginpeningskrøvini í Ll. nr. 24/1978 vóru uppfylt í sambandi við játtan av teim nógvu stuðulslánum í sambandi við umbyggingar, upplýsir - umsitingin generelt, at orka ikki hevur verið í umsitingini til at kanna, um hesar treytir vóru uppfyltar.

4. Tann fyri landsstýrinum upplýsti byggikostnaður, sum er nýttur sum støði undir veittum veðhaldum, stuðulslánum og rentustudningi, er í fleiri førum munandi hægri enn bókaða virðið á skipunum sambært ársroknskapunum, eins og eginpeningur/partapeningur sambært ársroknskapi/partafelagsskrásetingini ikki er á sama støði, sum upplýst fyri landsstýrinum.

   Umsitingin metir, at tað er ivasamt um krøvini um eginpening vóru uppfylt, vísandi til

omanfyristandandi hesum viðvíkjandi. Váttanir um eginpening, sáttmálaprísir og virðismetingar vóru tiknar fyri »góðar vørur«, men umsitingin metir, at tað onganlíð hevði verið rutina í landsstýrinum at biðja um ársroknskap fyri fyrsta árið, til tess at eftirkontrollera upplýsingar um t.d. skipavirðlð og eginpening/partapening. Ein av orsøkunum til tess, var ov lítil manning og manglandi fastar rutinur viðvíkjandi saksviðgerð.

Fært verður eisini fram, at Fiskivinnuumsitingin ikki varð stovnað fyrr enn í 1986 og ikki veruliga tók yvir ábyrgdina av skipabyggimálum fyrr enn í seinnu helvt av 1987 og var bundin av givnum tilsøgnum áðrenn hetta tíðarskeið.

5. Spurd um, hvør grundgevingin er fyri, at t.d. ein treyt fyri innflutningsloyvi til ein bát uppá 167 BRT er, at ein útróðrarbátur uppá 11,85 BRT fer úr føroyska veiðuflotanum, og hvørjar reglur hava verið galdandi hesum viðvíkjandi upplýsir umsitingin generelt, at reglurnar ikki hava verið heilt greiðar, og at talan ofta hevur verið um upp til fleiri og fleiri »umvekslingar« við minni og minni skip.

6. Fleiri dømi eru um, at landsstýrið í eitt langt áramál legði út pening sum veðhaldsútlegg fyri ávís skip, og samstundis fleiri ferðir gav boð um at steðga innkrevjing, sum gjaldstovan eftir áheitan frá landsstýrinum hevði tikið stig til. Umsitingin metir, at gongdin viðvíkjandi innkrevjing í hesum málum hevði verið við til at blokera alla innkrevjing og var ein av høvuðsforðingunum fyri, at farast kundi eftir øðrum, og hevur reist spurningin um, at tá veðhaldsútlegg ikki verða kravd innaftur og renturoknað í eitt so langt tíðarskeið, so er talan ikki longur um eitt veðhald, men heldur um eina óheimilaða rakstrarjáttan til ávís skip.

7. Umsitingin førir fram, at ein kann velja at siggja tey viðurskifti, sum umrødd verða í grannskoðanarfrágreiðingini sum einstøk mál, har málsviðgerðin hevur verið ov vánalig. Men mett verður, at í veruleikanum hava høvuðstrupulleikarnir verið feilir í umsitingarbygnaðinum, sum undir einum kunnu kallast »systemfeilir«:

   - a) Umsitingin hevur ikki verið nóg sterk og væl kvalifiserað á tungum uppgávum, t.d. viðvíkjandi veðhaldum og skipabyggimálum, og politisku myndugleikarnir hava sostatt í nógvum førum ikki havt eitt fakligt mótspæl.
   - b) Generelt hevði verið ov lítil manning í umsitingini.
   - c) Manglandi lógarkrøv/reglur um fakliga viðgerð og faklig tilmæli.
   - d) Manglandi krøv um skrivligar frágreiðingar í øllum málum, harundir ein meting bæði sum einkultmál og sum liður í einari samlaðari/størri samfelagsligari heild.
   - e) Tað hevur ikki verið førdur ein starvsfólkapolitikkur, ið kundi útvegað landsstýrinum ta arbeiðsmegi, ið landsstýrinum tørvaði, og hildið fast uppá hesa arbeiðsmegi. Hetta hevur ført við sær skeiva manning, stóra útskifting, og lítlan kontinuitet í arbeiðinum, og tað hava verið manglandi krøv um eftirútbúgving av teimum medarbeiðarum, ið ikki frá byrjan høvdu neyðugu útbúgvingarnar.

8. Veðhald fyri lánum til flakavirkir:

Í grannskoðanarfrágreiðingini eru veðhald til trý flakavirkir umrødd. Talan er um nøkur veðhald veitt í sambandi við munandi útbygging av P/F Norðis, P/F Sólarris og P/F Kósavirki-

num, sum ialt kostaðu landskassanum útvið 60 mió.kr., íroknað mistan partapening.

Veðhald fyri lánum til útbygging/framleiðsluøking á hesum og mongum øðrum flakavirkjum tykjast ikki vera veitt við støði í eini heildarmeting av tørvi á framleiðsluorku í mun til rávørunøgd. Felags fyri lán við landskassaveðhaldi var, at hesi ikki vórðu afturgoldin. Veðhaldsútlegg vóru ikki heintaði inn, men seinni niðurfryst ella avskrivað, eins og eftirstøður og fallin skuld av gomlum lánum við landskassaveðhaldi vórðu umskipað til nýtt lán við landskassaveðhaldi.

9. Veðhald fyri lánum til onnur virkir:

Í grannskoðanarfrágreiðingini eru veðhald veitt P/F Blue North, P/F Klaksvíkar Roykivirki og P/F Atlantic Fish Cold Storage umrødd.

Løgtingið samtykti í 1984 eina serstaka lóg, Ll.nr. 38/1984, um veðhald fyri láni til **P/F Blue North** uppá í mesta lagi 2,8 mió.kr. og at seta 460 t.kr. í felagið, og løgtingið varð kunnað um ætlaðu almennu studningsupphæddirnar uppá 2,1 mió.kr. Lógaruppskotið varð lagt fyri tingið áðrenn Búskaparráðið hevði havt høvi at viðgera málið. Tá avtornaði hevði Blue North-prosjektið kostað tí almenna, íroknað lán og stuðul úr Menningargrunninum, grunninum til ídnaðarfremjandi endamál, Menningarstovuni, serliga grunni III í Lønjavningargrunninum og konto »Landsstýrinum at ráða yvir« einar 45-50 mió.kr.

Við gjøgnumgongd av málinum sæst, at tað ikki verður víst til løgtingslóg nr. 38/1984 í sambandi við at veðhald seinni vórðu givin. Víst verður í staðin til Ll. nr. 18/1960 og til Ll. nr. 35/1988. Orsøkin er helst hon, at heimildin í Ll. nr. 38/1984 visti seg at vera alt ov lítil.

Umsitingin er biðin um geva eina frágreiðing um eitt goymsluveðhald uppá 5 mió.kr., ið veitt varð í 1987. Mett verður, at eitt veðhald fyri láni uppá 5.2 mió.kr., sum varð veitt í oktober 1988, vísandi til heimild í Ll. nr. 35/1988, ikki leyk treytirnar, sum ásettar vóru í lógini, víst varð til.

Í tíðarskeiðinum 1989 til 1992 legði landskassin út 17 mió.kr. vegna veðhald veitt í 1988 fyri tveimum lánum til **P/F Atlantic Fish Cold Storage**. Um Grunnurin til Ídnaðarfremjandi Endamál og Menningargrunnurin verða íroknaðir, misti landskassin ialt einar 25 mió.kr. í sambandi við, at virkið varð selt á tvingsilssølu.

Hóast umsitingin í sínum ummæli setti spurnartekin við grundleggjandi fyritreytir í einum uppleggi um byggingina av goymsluni, og Búskaparráðið í sínum ummæli greitt mælti frá, samtykti landsstýrið í 1986 í »prinsippinum« at veðhalda fyri lánum til hetta prosjekt.

Nevndin í Menningargrunninum samtykti í 1986 at veita lán uppá 2 mió.kr. til hetta prosjekt við landsstýrisins góðkenning, hóast Menningargrunnurin í drúgvari frágreiðing gjølla hevði greitt frá, at rentabilitetur ikki kom at vera í prosjektinum. Ein treyt fyri láninum var, at partapeningurin varð 15% av kostnaðinum. Boðað varð frá, at lánið ikki undir nøkrum umstøðum fór at verða hækkað. Lánið varð tó í 1988 og 1989 hækkað við ávikavist 2 og 0,5 mió.kr.

Vísandi til bókaða virðið av bygninginum í ársroknskapinum uppá 30 mió.kr. metti umsitingin

í einum tilmæli í 1990, at pláss var ikki fyri nøkrum landskassaveðhaldi, og at treytir settar av landsstýrinum og Menningargrunninum um eginpening/partapening ikki vórðu hildnar.

10. Veðhald fyri lánum til kommunur:

Manglandi samskifti millum landsverkfrøðingin og landsstýrið hava ført við sær, at ofta stórar havnaútbyggingar vórðu settar í verk, uttan at landsstýrið hevði havt høvi til at taka støðu til og geva neyðug loyvi eftir grein 39 í kommunulógini 2. stk., har ásett er, at um eitt arbeiði skal verða fíggjað við lántøku, má ikki verða byrjað, fyrr enn loyvi landsstýrisins fyriliggur. Tá umsóknir frá kommununum um lán/veðhald komu til landsstýrið, var hetta í so máta »ov seint«, við tað kommununar tá vóru sáttmálabundnar, og landsstýrið hevði tá onki annað val enn at játta. Tann einasta góðkenning, ið vanliga fyriliggur, er tann »tekniska« góðkenningin frá landsverkfrøðinginum, sambært Ll. nr. 61 frá 9. juni 1988 um 8-ára ætlan fyri útbygging av havnunum.

11. Veðhald fyri láni til P/F Atlantic Airways:

Tað størsta veðhaldið, ið veitt er í tíðarskeiðinum 1989-1991, er uppá 70 mió.kr. til P/F Atlantic Airways, í 1989.

Veðhald varð givið sambært løgtingslóg nr. 29 frá 20. apríl 1989. Orsøkin til at hetta veðhald varð givið tá var, at Maersk Air fekk dømt Cimber Air til at fara burturúr samvinnuni við føroyingar í p/f Atlantic Airways.

Í tí sambandinum yvirtók p/f Flogleiðir partapeningin hjá Cimber Air uppá 980 t.kr., svarandi til 49%, eins og landskassin yvirtók veðhaldsskylduna sum Cimber Air hevði fyri lántøku hjá P/F Atlantic Airways. Herfyri átti p/f Flogleiðir sostatt einsamalt allan partapeningin í P/F Atlantic Airways.

Sambært omanfyri nevndu lóg fekk landsstýrið heimild at hækka tann beinleiðis partapeningin í p/f Flogleiðir við 9.750 t.kr.

Við gjøgnumgongd av hesum løgtingsmáli sæst, at fíggjarnevndin í mars mánaði 1989 m.a. hevur gjøgnumgingið fíggjar- og rakstrarætlan fyri 1989 hjá p/f Atlantic Airways.

Sambært álitinum hevur fíggjarnevndin:

»fingið ta fatan, at vónir eru fyri, at raksturin av føroyska flogfelagnum framyvir kemur at bera seg - alt annað líka - um skynsamliga verður atborið. Fíggjarnevndin vil sostatt mæla løgtinginum til at veita landsstýrinum umbidnu heimildina at veðhalda, hóast upphæddin er stór.«

Í løgmansrøðuni í 1992 varð sagt: »*Føroyska flogfelagnum hevur enn ikki nýtst fíggjarligt ískoyti - og fær tað valla.*«

25. november 1992 legði landsstýrið uppskot fyri løgtingið um nýteknan av partapeningi í felagið uppá 75 mió.kr. Sambært viðmerkingum landsstýrisins til lógaruppskotið verður mett, at sum fíggjarstøðan er hjá felagnum er givið, at veðhaldið verður effektivt, og verður parta-

peningurin partvís (70 mió.kr.) nýttur til at niðurgjalda skuldina við, samstundis sum veðhaldið fellur burtur, og partvís nýttur til fskoytisgjaldføri hjá felagnum.

12. Veðhald fyri lánum til IRF:

Sambært lóg nr. 29, frá 5. mei 1981, varð landsstýrið heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri láni til Interkommunala Renovatiónsfelagsskapin til bygging av brennistøð.

Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið var ætlanin at byggja eina brennistøð, ið kundi brenna ruskið frá øllum landinum (3 tons ovn), og varð støðin mett at kosta 29,8 mió.kr. (í 1980- prísum).

Um heystið 1981 varð upptikið eitt lán uppá NLG 11,4 mió., tá svarandi til uml. 32,3 mió.kr., til 13 1/8% p.a., ið skuldi afturgjaldast við NLG 1.140.000 hvønn 5. oktober frá 1987 -1996.

Ymiskir trupulleikar vóru við at fáa byggiloyvi til brennistøðina, og ikki fyrr enn í 1987 kom gongd á byggingina av brennistøðini í Leirvík, sum varð tikin í nýtslu í 1989.

Hóast munandi broyttar umstøður og fyritreytir veitti landsstýrið í 1988, við heimild í omanfyrinevndu lóg nr. 29 frá 5. mei 1981, veðhald fyri einum nýggjum DEM-láni til IRF uppá 40 mió.kr., og í 1989 veðhelt landsstýrið fyri at DEM-lánið varð hækkað við 20 mió.kr. til í alt 60 mió.kr., sum allar fullu til gjaldingar í 1993.

Burtursæð frá 0,3 mió.kr. í 1981, hava kommununar ikki goldið limagjald í tíðarskeiðinum fram til 1989, tá brennistøðin varð tikin í nýtslu.

Árini 1989-1991 rindaðu kommununar bert acontogjøld. Hóast stór rakstrarhall varð endaliga limagjaldið tó ongantíð ásett og innkravt sambært § 5 í lógum felagsins.

Samlaðu veðhaldsútlegg landskassans fram til og við 1991 vóru einar 36,5 mió.kr. Av hesum var onki kravt innaftur frá limakommununum.

Tann 14. apríl 1993 samtykti løgtingið uppskot landsstýrisins um at strika 33 mió.kr. skuld hjá IRF, ið stavar frá útleggum fyri lánum hjá felagsskapinum. Sambært § 1, 2. stk., er strikingin treytað av, at felagsskapurin ger neyðug tiltøk, sum frameftir gera javnvág í rakstrinum.

Í sambandi við avtaluna, ið gjørd varð við donsku stjórnina í mei mánaði 1993 um umskipan av uttanlandsskuldini til statslán, varð skuld hjá IRF uppá 60 mió.kr. innfriað av landskassanum. Upphæddin verður ikki renturoknað og enn er ongin endalig avtala/afturgjaldsskipan gjørd hesum viðvíkjandi, og ongin renta er goldin fyri 1993.

Uppá fyrispurning metir umsitingin, at treytirnar í § 1, 2. stk., fyri at strika 33 mió.kr. í skuld hjá IRF sambært omanfyrinevndu lóg ikki eru uppfyltar, og hevur lagt nýtt lógaruppskot fyri tingið.

13. Innkrevjing:

Í grannskoðanarfrágreiðingini verður víst á, at landskassin seinnu árini hevur mist tíggjutals milliónir í sambandi við at vøruinnflytarar hava fingið undantaksloyvi til **tollkreditt**. Landskassin kemur í so at siga øllum førum at missa pening, um ein vøruinnflytari kemur í fíggjarligar trupulleikar, av tí at kreditttíðin er 2-3 mánaðir, meðan trygdin er ásett við støði í innflutningsgjaldinum í í meðal mánaði, men mett verður, at høvuðsorsøkin til, at tað hava verið so stór tap viðvíkjandi tollkreditti er, at umsitingin av hesum undantaksloyvum ikki hevur verið í tráð við kunngerðina frá landsstýrinum. Hóast vøruinnflytarar ikki hava goldið og ikki latið skjøl inn til tollingar til ásetta tíð, er alt ov long tíð gingin til vøruinnflytarin hevur mist undantaksloyvið. Reglurnar um straffrentu eru ikki fylgdar, og rentur eru strikaðar/eftirgivnar hóast ongin heimild hevur verið til tess. Í fleiri førum hevur trygdin verið undir tað, ið ásett er í kunngerðini.

Umframt tollkreditt hava trupulleikar eisini verið við innkrevjing av øðrum gjøldum. Viðvíkjandi **brennioljugjaldi** hevur landskassin eftir øllum at døma mist góðar 6 mió.kr. tí P/F Oljufelagið Føroyar ikki hevur avroknað hesi gjøld. Ongar beinleiðis ásetingar hava verið í lógini um kreditt fyrr enn frá 1. januar 1993, men onki er ásett um trygd.

- - - - -

Viðvíkjandi avrokning/innkrevjing av **ferðagjaldi** verður landsstýrið, upprunaliga í Ll. nr. 23/1987, at áseta nærri reglur fyri inngjalding av gjaldinum.

Hesar reglur eru ikki ásettar, og upplýst er frá Toll- og Skattstovu Føroya, at mannagongdin vanliga hevur verið, at ferðagjøld eru avroknað sum tollkredittur. Henda tíðarfreist er í fleiri førum ikki hildin, og vísandi til at onki er ásett í lóg/kunngerð um rentur, trygd ella kreditttíð, hevur gjaldstovan reist spurningin, um heimild er at geva kreditt/gera serligar gjaldsavtalur við ávís felløg. Upplýst er, at Toll- & Skattstova Føroya arbeiðir við at gera uppskot til greiðar reglur fyri avrokning av gjaldinum.

- - - - -

Eftir fýra kvartalum eru skrásettu **MVG** eftirstøðurnar á Føroya Gjaldstovu vaksnar til 34 mió.kr.

Tað tykist ikki sum tann orka og tey amboð, ið nýtt verða til innkrevjing av omanfyrinevndu gjøldum (primert panting, nú oftast úrslitaleyst) eru nóg munagóð, samstundis sum uppskot, ið talan varð um, um broyting í ymsum vinnulógum við tí fyri eyga at kunna sýta ella taka vinnuloyvi aftur, ikki varð lagt fyri tingið.

- - - - -

Nevnast kann eisini, at innkrevjingarlóggávan ikki er samskipað og dagførd.

- - - - -

Skattaeftirstøðurnar eru somuleiðis vaksandi. Viðvíkjandi partafelagsskatti er talan um eini 1000 partafeløg, nógv av hesum hava hvørki latið roknskap ella sjálvuppgávu inn í áravís, og ein stórur partur av eftirstøðunum eru »metingar«.

- - - - -

Viðvíkjandi **veðhaldum/veðhaldsútleggum, serlánum, stuðulslánum og kredittum til vinnulívið annars**, er tað landsstýrið, sum primert hevur/hevur havt ábyrgdina av at fylgja við gongdini og at geva gjaldstovuni boð um skráseting, bókingar, hvørji stig skulu takast viðvíkjandi innkrevjing, avskriving v.m.

Búskapardeildin metir í hesum sambandi, at tað er týdningarmikið at strika undir, at innkrevjingarfulltrúin bert er ein persónur, sum í tíðarskeiðinum 1991-1993 hevði havt úr at gera við at fáa skil á teimum mongu effektivu veðhaldunum uppá uml. 0,5 mia.kr.

Landsstýrið hevur í nógvum førum ikki givið boð um eina »effektiva« innkrevjing, og í fleiri førum givið boð um at steðga innheintingum, tvingsilssølum, sum stig annars vóru tikin til.

Í nógvum førum hava peningastovnarnir miðvíst stýrt gjaldførinum hjá virkjum/skipum á ein hátt, so at almenn gjøld, ella afturgjalding av landskassalánum ella løgt rentaðum lánum við landskassaveðhaldi, koma í síðstu røð, og skip og virkir hava kunna hildið áfram í áravís, hóast veðhaldsútlegg og vaksandi eftirstøður av almennum lánum. Samstundis sum nýggj veðhald og almenn lán eru veitt, eru gomul veðhald og misrøkt lán í fleiri førum »umløgd« ella »umskipað«.

Vísast kann á tilmæli frá innkrevjingarfulltrúanum í 1992 um at lýsa eitt felag konkurs. Í hesum sambandi varð m.a. umrøtt um § 74 í konkurslógini kundi nýtast til at »umstoyta« afturgjaldingar av lánum, m.a. til ein ávísan banka vegna »tilvitaða forfordeiling«.

Løgfrøðiliga varð tá mett, at lítil kjansur var fyri at fáa viðhald í rættinum, m.a. vísandi til at landsstýrið hevði verið fult vitandi um hesi viðurskifti og havt avtalur við bankarnar um at loyva, at eftirstøðurnar á lánum við landskassaveðhaldi kundu vaksa, uttan at krevja at veðhaldini skuldu gerast effektiv.

Mett verður ikki, at landsstýrið hevur havt heimild at umsita veðhald og veita lán á ein tílíkan hátt uttan aðra lógarheimild ella játtan.

- - - - -

Nógv hava framvegis eina fatan av, at afturgjalding av ávísari almennari skuld/eftirstøðum kann koma í síðstu røð, uttan at hetta fær stórvegis avleiðingar, og skip og virkir hava m.a. av hesi orsøk kunna hildið áfram, hóast tey hava verið »konkursbúgvin« í fleiri ár.

Hetta hevur verið og er kappingaravlagandi, og tey vinnuvirki/skip, ið hava roynt at hildið sínar skyldur ella ikki havt landskassalán ella lán við landskassaveðhaldi, hava verið fyri vanbýti.

- - - - -

Trupulleikarnir viðvíkjandi teim vaksandi eftirstøðunum eru ikki nóg »sjónligir«, m.a. tí broytingar í eftirstøðunum ikki beinleiðis verða úknar við á fíggjarlógini, sum tí ikki gevur eina greiða mynd av veruligu inntøkunum og harvið gjaldføristørvinum, og innkrevjingaramboðini og leikluturin hjá Føroya Gjaldstovu í hesum sambandi verður tí ikki tikin til viðgerðar fyrr enn tað er ov seint. Búskapardeildin upplýsir, at tað er avgjørt at taka broytingar í eftirstøðum við í sambandi við uppsetan av fíggjarlógini fyri 1995.

14: Búskaparráðið:

Sambært løgtingslóg nr. 42/1963 verður landsstýrið at skipa eitt Búskaparráð við trimum limum við tí endamáli:

- at kanna fíggjarligu støðu hins almenna og fíggjarligu viðurskifti landsins,
- at fáa bygt upp tíðarsvarandi og rationellan framleiðsluútbúna,
- at leggja haldgott grundarlag undir hinar einstøku vinnulívsgreinarnar og búskap landsins sum heild,
- at tryggja og økja inntøkumøguleikar vinnustættana.

Sambært lógini fær ráðið heimild til at taka sær skrivara, sakkøna og aðra hjálp og at krevja sær frágreiðingar og aðrar upplýsingar frá stovnum og felagum. Ásett er eisini í lógini, at tann sum við vilja gevur rangar frágreiðingar ella noktar fyri at gera frágreiðingar, kemur undir sekt, um hann ikki kemur undir hægri revsing.

Sambært viðmerkingum landsstýrisins til uppskotið var skipan av ráðnum ein liður í at fáa bygt upp tíðarsvarandi og rationellan framleiðsluútbúna. Endamálið við ráðnum var sostatt m.a. at hjálpa til at veita trygt støði undir uppskotum um fíggjarliga og vinnuliga útbygging.

Í reglugerð fyri Búskaparráðið, sum lýst í kunngerð nr. 47/1969 var m.a. ásett. at ráðið skal ganga landsstýrinum til handa at kanna búskaparligar spurningar á teim ymsu vinnulívsøkjunum, viðgera og geva ummæli í serstøkum málum, sum verða løgd fyri tað, og seta fram uppskot um tiltøk, sum ætlast at vera vinnulívinum at gagni.

Búskaparráðið hevur fingið nøkur av omanfyri umrøddu málum til ummælis, men tað tykist ikki hava verið nøkur skipað mannagongd hesum viðvíkjandi. Í nøkrum førum tók landsstýrið avgerð um lán/veðhald áðrenn Búskaparráðið hevði havt høvi at taka støðu til eitt mál. Í flestu førum mælti Búskaparráðið frá, men landsstýrið fylgdi í nógvum førum ikki hesum tilmælum, uttan at tað greitt sæst, hvørjar aðrar fyritreytir landsstýrið hevur lagt dent á í sínum avgerðum.

Lógin um búskaparráð varð avtikin sambært § 8, 2. stk., í Ll. nr. 33 frá 7. mei 1991 um Hagstovu Føroya.

15: Ymsir grunnar:

- **Orkugrunnurin**

Reglur um orkugrunn og orkuráð eru ásettar í løgtingslóg nr. 48/1979 um Orkuráð og Orkugrunn.

Sambært § 1 í lógini verður landsstýrinum heimilað at skipa 5-manna ráð, hvørs uppgáva er at vera ráðgevi hjá politisku myndugleikunum í øllum orkuspurningum, harundir av egnum ávum gera tiltøk, sum vera mett deils at veita hollari kunnleika á orkuøkinum, og deils at geva myndugleikunum betri grundarlag at taka avgerðir á.

Í § 2 er ásett, at um landsstýrið og Orkuráðið eru samd um, at ávísar metingar, kanningar ella royndir eiga at verða framdar, verða útreiðslurnar, ið standast av hesum tiltøkum, goldnar úr Orkugrunninum. Í henda grunn verður, sum tørvur er á, játtaður peningur á fíggjarløgtingslógunum.

Orkugrunnurin varð avtikin í 1991, og varð hetta staðfest við løgtingslóg nr. 33 frá 27. mars 1992 um avtøku av landskassagrunnum.

Umframt útreiðslur til Orkuráðið uppá 7,3 mió.kr., eru úr grunninum síðani 1980/81 eisini nýttar einar 11,3 mió.kr. til ymiskar kanningar og royndir viðvíkjandi vindorku, vatnmegiútbygging, kanning av avlopshita, bjálving av húsum o.t.

Lánsveiting

15. desember **1987** samtykti landsstýrið at veita eitt lán úr Orkugrunninum uppá **2,5 mió.kr.** til **P/F Oljufelagið Føroyar** til partvísa fígging av oljutangum. Restskuldin í dag er umr. 1,6 mió.kr. Felagið hevur í eitt longri tíðarskeið ikki avroknað oljugjald, og talan er um í alt einar 6,4 mió.kr. Felagið er lýst konkurs, men virksemið heldur fram í øðrum navni/felag.

18. februar **1988** samtykti landsstýrið at veita fjarhitaskipanini **20 mió.kr.** í láni úr Orkugrunninum eftir stuðulslánstreytum. Lánið varð útgoldið til **L/F Hitafelagið** í 1989 við panti í fløgunum. Hesin peningur er síðani mistur, í sambandi við at ognir felagsins eru seldar á tvingsilssølu og felagið er farið konkurs.

7. apríl **1989** samtykti landsstýrið at veita eitt lán uppá **2,5 mió.kr.** úr Orkugrunninum til IRF til fløgur í ROY/IRF, sum tekur sær av olju- og oljulíknandi burturkasti, har ein partur av spilloljuni kann endurnýtast sum brenniolja.

- **Oljugrunnurin**

Við løgtingslóg nr. 99 frá 1. oktober 1986 um serligt gjald á brenniolju v.m. varð gjald lagt á innflutningin av olju v.m.

Sambært § 3, stk. 1 í lógini varð ásett, at tær inntøkur, sum landskassin fær av gjaldi sambært hesi lóg, fara í serstakan grunn (Oljugrunnin).

Sambært § 3, 2. stk., hevði grunnurin til endamáls at veita almennum stovnum og grunnum lán fyri at mótvirka lántøku uttanlands.

Oljugrunnurin varð avtikin í 1991, og varð hetta staðfest við løgtingslóg nr. 33 frá 27. mars 1992 um avtøku av landskassagrunnum.

Brennuoljugjaldið í tíðarskeiðinum 1986 til 1990 var 367 mió.kr., og harumframt hevur

grunnurin hesi árini havt rentuinntøkur uppá uml. 35 mió.kr.

Oljugjaldið hevur í tíðarskeiðinum 1986 til 1990 ikki ávirkað yvirskot/hall á fíggjarlógini, men er lagt í oljugrunnin.

Samanumtikið kann sigast, at av innkravda oljugjaldinum í tíðarskeiðinum 1986 til 1990 kom umleið helmingurin ongantíð í grunnin, men varð nýttur til at fíggja rakstur/hall landskassans hesi árini.

Lánini til Menningargrunnin, Húsalánsgrunnin og Føroya Ídnaðargrunn í alt 110 mió.kr. eru síðani eftirgivin við lóg í sambandi við fíggjarligar trupulleikar í hesum grunnum, og tær 35 mió.kr., ið læntar vórðu til L/F Hitafelagið í 1990, eru mistar í sambandi við, at ognir felagsins eru seldar á tvingsilssølu og felagið farið konkurs.

Lánið uppá 35 mió.kr. til L/F Hitafelagið í 1990 varð veitt í sambandi við, at felagið tá var í fíggjarligum trupulleikum vegna broyttar fortreytir og m.a. ikki hevði fingið fígging úr fleggingargrunninum fyri Føroyar, sum ikki metti seg hava nóg góða trygd, vísandi til § 4 í viðtøkunum fyri L/F Hitafelagið, har ábyrgdin hjá lutaeigarunum SEV og Tórshavnar Kommunu var avmarkað til 0,5 mió.kr. fyri hvønn.

Í einum tilmæli frá umsitingini dagfest 27. februar 1990 verður víst á, at tá landsstýrið í sínari tíð veitti eitt lán uppá 20 mió.kr. úr Orkugrunninum, varð dentur lagdur á, at landsstýrið við hesum hevði gjørt sín part og hjálpt til við tí likviditetstilskoti, sum var neyðugt í uppbyggingarfasuni, sambært útrokningum hjá Orkuráðnum, og at tað neyvan hevði verið so stór undirtøka tá, um tað tá var komið fram, at likviditetstilskotið heldur skuldi vera 55 mió.kr. og eisini umfata veðhald fyri lánum hjá Hitafelagnum.

Í tilmælinum verður m.a. víst á, at við Hitafelagnum er tann høvuðsóvissa, at ongin reiðiliga hevur ábyrgdina. Tórshavnar kommuna hevur sett 500 t.kr. í felagið, men vil annars onga ábyrgd hava, og SEV hevur sett 500 t.kr. í og sigur tað heldur ikki vera nakað hjartamál hjá sær. Upplýst verður, at stýrið fyri Íleggingargrunnin vísti til hesa væntandi ábyrgd tá tað avvísti at læna út pening til Hitafelagið. Mett verður, at eitt minstakrav má vera, at Hitafelagið so ella so við kommunu ella brúkarum hevur eina fíggjarliga ábyrgd og ikki bert kann draga lán úr landskassanum ella veðhald.

Mælt varð tí til, at lánið uppá 35 mió.kr. úr Oljugrunninum ikki verður útgoldið áðrenn hesi viðurskifti eru fingið í rættlag og fult yvirlit fæst yvir, hvussu nógv ætlanin er at ábyrgja landskassan.

Í tilmælinum verður lagt aftrat, at umsitingin heldur tað vera sera óheppið, at formaðurin í tí stovni, ið hevur ráðgivið landsstýrinum í hesum máli, fyrst er vorðin nevndarlimur og síðani stjóri í Hitafelagnum, uttan at landsstýrið hevur fingið hetta at vita.

- **Gistingahúsgrunnurin**

Løgtingið hevur í nógv ár játtað pening á teim árligu fíggjarlógunum til Gistingarhúsgrunnin, fyrstu ferð á fíggjarløgtingslógini 1949/50, vísandi til løgtingssamtykt frá 17. desember 1949.

Í 1989 játtaði grunnurin 2,6 mió.kr. og í 1990 2,7 mió.kr. í lánum. Í 1991 og 1992 vórðu ikki veitt nøkur lán úr grunninum. Í sambandi við grannskoðanina av ársroknskapinum fyri 1990, varð gjørt vart við, at í samlaða útláni grunsins uppá 9,2 mió.kr. vóru fleiri debitorar, sum í áravís ikki høvdu goldið rentur og avdráttir, eins og nakrar av ognunum, ið grunnurin hevði veð í, vóru seldar á tvingsilssølu.

Mett var, at fyriskipaða mannagongdin viðvíkjandi lánsjáttanum í flestu førum ikki hevði verið nóg trygg, og í ávísum førí beinleiðis í stríð við reglugerðina, og at tað harumframt eisini kundi hugsast, at virksemi grunsins í ein ávísan mun hevur verið til skaða fyri og forða fyri eini menning av tí partinum av hotelvinnuni, ið hevði roynt at hildið sínar skyldur og bygt á eitt meira umhugsað grundarlag. Í hesum sambandi varð víst á, at tað hevur verið ein trupulleiki at lánsveiting, fyrisiting, bókhald og innkrevjing ikki hevur verið á einum stað.

Við heimild í Ll. nr. 33 frá 27. mars 1992 um avtøku av landskassagrunnunum, lýsti landsstýrið 7. oktober 1992 kunngerð um Grunn Ferðavinnunar, sum yvirtók fæ Gistingarhúsgrunsins.

- **Grunnar viðvíkjandi samferðslumálum**

Í grannskoðanarfrágreiðingini er nýtslan í teimum 4 størstu grunnunum á samferðsluøkinum nærri útgreinað.

- **Veðhaldsgrunnurin**

Grunnurin móti tapum av veðhaldum varð avtikin í 1991. Sambært landskassaroknskapunum 1988-1990 vórðu niðanfyristandandi upphæddir skrásettar við ársenda í hesum grunni.

(mió. kr.)

AKTIV (akkumulerað veðhaldsútlegg, netto)	1988	1989	1990
Skála Skipasmiðja	49,8	127,4	147,1
Vágs Skipasmiðja	5,4	25,1	44,4
Veðhaldsútlegg	464,9	634,5	707,0
Saldo ultimo ialt	520,1	787,0	898,5
PASSIV (játtan ÷ avskrivað veðhaldsútlegg)			
Saldo primo	251,1	503,3	586,9
Játtan á fíggjarlógini, § 21	50,0	105,0	80,0
Landskassaavlop 1987	231,4	-	-
Rentur	0,3	0,3	0,2
Avskrivað veðhaldsútlegg	÷29,5	÷21,7	÷58,3
	252,2	83,6	21,9
Saldo ultimo ialt	503,3	586,9	608,8
Munur ímillum aktiv og passiv (meirnýtsla)	16,8	200,1	289,7

Munur ímillum aktiv og passiv vísir hvussu nógv er skrásett sum veðhaldsútlegg við ársenda í mun til tað, sum í alt er játtað í grunnin. Tá grunnurin varð avtikin í 1990, var akku-

mulerað »meirnýtslan« 289,7 mió.kr.

Í sambandi við at grunnurin varð avtikin, vórðu akkumuleraðu nettoveðhaldsútleggini uppá 898,5 mió.kr. ultimo 1990 avskrivað roknskaparliga.

Í grannskoðanarfrágreiðingini finnast yvirlit yvir tey størstu veðhaldsútleggini.

6. *Løgtingsgrannskoðararnir/viðmerkingar:*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið grannskoðanarfrágreiðingina frá Grannskoðanardeild Landskassans og løgtingsins statsautoriseraða grannskoðara og hava harumframt kunnað seg nærri um ávís øki við at gjøgnumganga arbeiðsskjøl, fundarfrágreiðingar, viðmerkingar og samskiftið við landsstýrið/umsitingina.

Viðvíkjandi teim viðurskiftum, sum umrødd eru av roknskapargrannskoðanini, hava løgtingsgrannskoðararnir hesar viðmerkingar:

Meirnýtsla

Løgtingsgrannskoðararnir átala enn einaferð ta meirnýtslu, ið verið hevur, og at landsstýrið ikki fyrr enn í 1991 legði eina eykafíggjarlóg fyri tingið.

Viðvíkjandi leiklutinum hjá fíggjarnevndini í sambandi við tær nógvu eykajáttanir, ið givnar verða, mæla løgtingsgrannskoðararnir til, at løgtingið samtykkir eina reglugerð fyri virkseminum hjá fíggjarnevndini, harundir nær og undir hvørjum umstøðum umbøn um eykajáttan skal leggjast fyri tingið og nær ein umbøn um eykajáttan kann leggjast fyri fíggjarnevndina, greiðar reglur fyri hvørji krøv ein umbøn um eykajáutan frá fíggjarnevndini skal lúka, innlit í tey mál viðvíkjandi eykajáttan, ið viðgjørd verða í fíggjarnevndini o.s.fr.

Upphøggingarstuðul

Átalað verður, at upphøggingarstuðulin, sum varð veittur eftir reglugerð nr. 27/1988, ikki í øllum førum varð veittur í tráð við reglugerðina. Mett verður, at stuðulin serliga hevur verið til fyrimuns fyri og hevur hjálpt persónum, feløgum og peningastovnum burtur úr fíggjarligum trupulleikum.

Serlán

Átalað verður, at treytirnar fyri lánsveitingum sambært lóg/kunngerð í fleiri førum ikki vórðu hildnar.

Almannamál

Løgtingsgrannskoðararnir átala umsitingina av pørtum av almannaøkinum og meta, at bæði føroyskir og danskir myndugleikar hava undirmett tað stóru uppgávu, ið yvirtøkan av umsitingini av einum so stórum málsøki bar í sær.

Lóg nr. 13/1967 um veðhald fyri prioritetslánum

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at stig ikki longu fyrst í áttatiárunum vórðu tikin til at endurnýggja lóg nr. 13/1967.

Viðvíkjandi ábyrgdar-/heimildarspurninginum hjá landsstýrinum er avgerandi at vísa á, at Fíggjarnevnd Føroya Løgtings hevur samtykt øll veðhald fyri prioritetslánum til fiskiskip.

Um sammett verður við støðuna hjá einum donskum ráðharra, verður statsrættarliga vanliga mett, at hesin uttan ábyrgd kann halda eina útreiðslu, um so er at henda er samtykt av fíggjarnevndini (burtursæð frá heilt serligum førum, m.a. tá skeivar ella villleiðandi upplýsingar eru latnar nevndini, ella tá ráðharrin átti at vitað, at tingið ikki vildi góðkenna avgerð fíggjarnevndarinnar).

Veðhald-/veðhaldsútlegg fyri lánum til fiskiskip

Eins og ført varð fram í álitinum frá løgtingsgrannskoðarunum, dagfest 16. februar 1994, viðvíkjandi roknskapunum hjá Lønjavningar- og Ráfiskagrunninum má ásannast, at milliard-stuðulin úr hesum grunnum, tey nógvu veðhaldini og stuðulslán v.m. í sambandi við bygging og umbygging av skipum ikki hava verið samfelagnum til gagns, í tann mun ætlanin var.

Ein av orsøkunum er óivað, at tær politisku avgerðirnar ikki hava bygt á eitt nóg gott fakligt grundarlag, hvørki tá talan er um einkultmál ella út frá eini vinnuligari og samfelagsligari heildarmeting.

Rakstrarætlanirnar hava ikki verið nóg realistiskar og eftirfarandi og fleiri av fløgunum áttu neyvan at verið gjørdar, serliga um tað eisini vísir seg, at eginpeningurin, sum stórur dentur varð lagdur á í sambandi við at hesi prosjekt vórðu góðkend í fíggjarnevndini, í fleiri førum ikki hevur verið til staðar.

Viðvíkjandi byggiláni til bygginr. 53 á Skála Skipasmiðju hava løgtingsgrannskoðararnir heft seg við, at uml. 40 mió.kr. longu áðrenn 1988 vóru nýttar til onnur endamál, uttan at meira varð gjørt við hetta mál mótvegis Skipasmiðjuni. Løgtingsgrannskoðararnir meta, at tað í fyrsta lagi má vera ábyrgdin hjá byggilánsveitaranum at ansa eftir, at peningurin verður nýttur til tað hann skal, og viðvíkjandi bygginr. 46 ivast løgtingsgrannskoðararnir í, um síðsta rata hoyrir heima í búnum.

- - - - -

Løgtingsgrannskoðararnir heittu í apríl 1993 á gjaldsstovuna um at gera eitt yvirlit yvir, hvussu nógvur peningur er goldin úr landskassanum til P/F Føroya Banka, P/F Sjóvinnubank-an og útlendskar bankar sum veðhaldsútlegg, upphøggingarstuðul og serlán/kreppulán seinastu 5-10 árini. Eitt yvirlit, sum samanlagt er uppá 1,75 mia.kr., vísir, at uml. 640 mió.kr. eru útgoldnar vegna lán í P/F Føroya Banka og P/F Sjóvinnubankanum, og meira enn 1 mia.kr. er farin til útlendskar lángevarar.

Veðhald fyri lánum til flakavirkir

Mett verður, at fleiri av teimum veðhaldum fyri lánum til tær nógvu útbyggingar av flakavirkjum, ið gjørdar eru, í størri mun áttu at bygt á eina vinnuliga heildarmeting av tørvinum á framleiðsluorku í mun til tilfeingi/rávørunøgd.

Veðhald fyri lánum til onnur virkir

Løgtingsgrannskoðararnir átala landsstýrið í sambandi við fleiri av teimum veðhaldum, ið veitt vórðu.

Veðhald fyri lánum til kommunur

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at kommunur kundu fara undir útbyggingar við stórari lántøku, uttan at neyðug loyvi til tess var givið sambært § 39 í kommunulógini.

Veðhald fyri láni til P/F Atlantic Airways

Í sambandi við at løgtingið við lóg yvirtók stórar veðhaldsskyldur í felagnum frá Cimber Air, kunnaði fíggjarnevndin í mars 1989 løgtingið um, vísandi til fíggjar- og rakstrarætlanir, at fíggjarnevndin hevði fingið ta fatan, at felagið fór at bera seg.

Vísandi til hesar upplýsingar undrast løgtingsgrannskoðararnir á, at fíggjarliga gongdin í flogfelagnum longu í 1989 gjørdist so vánalig.

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at tað í løgmansrøðuni 1992 vórðu bornar so skeivar upplýsingar um støðuna m.a. vísandi til, at løgtingið longu í november sama ár fekk eitt lógaruppskot frá landsstýrinum, har staðfest varð, at veðhaldið uppá 70 mió.kr. varð effektivt.

Veðhald fyri lánum til IRF

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at landsstýrið í so nógv ár legði pening út fyri lán uttan at hesin varð kravdur innaftur og uttan at leggja málið fyri tingið.

Innkreving

Løgtingsgrannskoðararnir mugu endurtaka átaluna í seinasta áliti um landskassaroknskapirnar, sum varð lagt fyri tingið í 1992, har átalað varð, at landsstýrið ikki hevði sýnt neyðugt fíggjarligt umhugsni viðvíkjandi útláns- og veðhaldsvirksemi landsins og í alt ov stóran mun umsitið givin lán og veðhald, uttan at fylgja nóg væl við og taka neyðug stig mótvegis lántakarum, ið ikki halda sínar skyldur. Mett verður, at hetta munandi hevur økt um landskassans tap og viðført stórar meirrentur, og verið til skaða fyri og forða eini menning av tí partinum av vinnuni, ið hevur roynt at hildið sínar skyldur og bygt á eitt meira umhugsað grundarlag.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla til, at álagt verður landsstýrinum beinanvegin at endurskoða og broyta kunngerðina um tollkreditt, so ongi tap á hesum øki vera framyvir.

Mælt verður somuleiðis til, at innkrevjingarlóggávan verður dagførd, at munagóð stig verða tikin viðvíkjandi teim vaksandi MVG-eftirstøðunum, at greiðar reglur verða ásettar viðvíkjandi avrokning, renturokning, trygd v.m. viðvíkjandi brennioljugjaldi og ferðagjaldi, og at munagóð stig verða tikin viðvíkjandi skattaeftirstøðum m.a. mótvegis teim hundraðtals partafeløgunum, sum í mong ár hvørki hava latið inn roknskap ella sjálvuppgávu.

Búskaparráðið

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at landsstýrið í nøkrum førum hevur tikið avgerð í málum, sum eru send Búskaparráðnum til ummælis, uttan at bíða eftir svari, og í øðrum førum ikki fylgt tilmælum frá ráðnum, uttan at tað greitt framgongur, hvørjar aðrar fyritreytir landsstýrið bygdi sínar avgerðir á.

Løgtingsgrannskoðararnir átala somuleiðis at landsstýrið, hóast lóg og reglugerð um búskaparráð, ikki hevur skipað so fyri, at ráðið fekk tann leiklut hesum var ætlað.

Ymsir grunnar

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at helmingurin av oljugjaldinum ongantíð kom í oljugrunnin. Somuleiðis átala løgtingsgrannskoðararnir, vísandi til fíggjarligu støðuna hjá L/F Hitafelagnum ultimo 1989, at landsstýrið veitti eitt lán uppá heilar 35 mió.kr. úr hesum grunni í 1990, uttan at hetta varð lagt fyri tingið. Talan var um lán, sum ongin annar vildi veita.

Løgtingsgrannskoðararnir taka undir við metingini hjá umsitingini, sum heldur tað vera sera óheppið, at formaðurin í tí stovni, sum hevur ráðgivið landsstýrinum í hesum máli, fyrst er vorðin nevndarlimur í Hitafelagnum, valdur av Tórshavnar kommunu, og síðani stjóri í felagnum, uttan at landsstýrið fekk hetta at vita.

Viðvíkjandi veðhaldsgrunninum verður átalað, at ikki nóg mikið varð avsett í grunnin.

Viðvíkjandi Gistingarhúsgrunninum átala løgtingsgrannskoðararnir, at fyriskipaða mannagongdin viðvíkjandi lánsjáttan ikki hevur verið nóg trygg, og ikki í øllum førum í tráð við reglugerðina.

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at 25 mió.kr. eru lænt úr orkugrunninum sum lán til beinleiðis íløgur til privat og interkommunalt virksemi og meta, at rættast hevði verið, at løgtingið beinleiðis varð biðið um heimild til at veita hesi lán.

Vísandi til álitið frá løgtingsgrannskoðarunum, grannskoðanarfrágreiðingina fyri roknskapir landskassans 1989-1991 og onnur viðurskifti, landsstýrið í hesum sambandi er kunnað nærri um, verður álagt løgmanni til at gera eina meting av, í hvønn mun ein møgulig ábyrgd í ávísum málum eigur at staðfestast og á hvønn hátt hetta kann gerast og kunna løgtingið um hetta.

1. viðgerð 26. apríl 1994. Málið varð beint í grannskoðaranevndina. Burturdottið vegna samgonguslit.

48 Úrgildissetan av "Lov for Færøerne om bekæmpelse af kønssygdomme

Ár 1993, hósdagin 2. desember legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til
samtyktar

Løgtingið mælir ríkismyndugleikunum til at "Lov nr. 74 af 24. februar 1960 for Færøerne om bekæmpelse af kønssygdomme" verður sett úr gildi í Føroyum.

Viðmerkingar:
Ríkisumboðið hevur í skrivi dagfest 10. mars 1993 biðið um støðutakan landsstýrisins til, at "Lov for Færøerne om bekæmpelse af kønssygdomme" verður sett úr gildi.

Fólkatingið samtykti í 1988 at seta samsvarandi lógina í Danmark úr gildi. Hetta hevur ikki havt við sær, at fleiri tilburðir hava verið av kynssjúkum í Danmark.

Landslæknin hevur mælt til, at lógin fyri Føroyar um kynssjúkur somuleiðis verður sett úr gildi.

Viðvíkjandi nærri upplýsingum um orsøkirnar fyri at avtaka hesa lóg verður víst til skjal 1, ið er viðmerkingarnar til samsvarandi lógaruppskotið í Danmark um at avtaka kynssjúkulógina har.

1. viðgerð 28. desember 1993. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 2. december 1993 og eftir 1. viðgerð 28. december 1993 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við landslæknan, Høgna Debes Joensen.

Í 1988 varð danska lógin frá 1973 um "Bekæmpelse af kønssygdomme" sett úr gildi. Uppskotið til samtyktar snýr seg um, at henda lóg nú eisini verður sett úr gildi í Føroyum. Tað var eitt at kalla samt fólkating, ið tók undir við at seta úr gildi hesa lóg, ið var vorðin ótíðarhóskandi. Niðurstøða fólkatingsins var, at tað var meiningsleyst og diskriminerandi, at hava eina lóg, sum í veruleikanum bert fevnir um eitt avmarkað tal av ræðiligum vandaleysum kynssjúkum, ið kunnu viðgerast, meðan lógin t.d. ikki fevnir um sjúkuna eyðkvæmi, ið ikki kann viðgerast.

Avgjørt varð at broyta kós á kynssjúkuøkinum og leggja til rættis ein fyribyrgjandi politikk, ið er grundaður á, at viðgerðin skal vera sjálvboðin, anonym og ikki diskriminerandi. Rættarnevndin metir, at tað er rætt, at vit eisini í Føroyum fylgja hesi kós. Rættarnevndin heldur, at tað er avlagandi fyri viðgerðina av hesum uppskoti til samtyktar at vísa til trupulleikarnar av sjúkuni eyðkvæmi, ið lógin als ikki fevnir um. Víst verður á, at eyðkvæmi er ikki kynsjúka.

Royndirnar vísa, at talið av kynsjúkutilburðum er nógv minkað í Danmark, hóast lógin ikki hevur verið í gildi. Tað er tí **ein sand rættarnevnd**, ið mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 14. apríl 1994. Málið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

49 Løgtingslóg um serliga viðbót til langfarafiskimenn

Ár 1993, leygardagin 18. desember legði Thomas Arabo, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um serliga viðbót til langfarafiskimenn.

§ 1. Langfarafiskimenn hava fyri árið 1993 rætt til serliga viðbót fyri telefonútreiðslur.

§ 2. Langfarafiskimenn eru fiskimenn, búsitandi í Føroyum, sum mynstra við fiskiskipum undir føroyskum flaggi, har túrarnir vara longri enn 30 dagar.

§ 3. Serliga viðbótin er 30 kr. fyri hvønn mynstringardag á túrum longri enn 30 dagar.

§ 4. Lønjavningargrunnurin umsitur hesa lóg.

lagtingslov om særligt tillæg til fiskere på fjernfiskeri.

§ 1. Fiskere på fjernfiskeri har ret til for året 1993 at oppebære særligt tillæg vedrørende telefonudgifter.

§ 2. Ved fiskere på fjernfiskeri forstås fiskere, bosiddende på Færøerne, som påmønstrer fiskerfartøjer under færøsk flag i fiskeri, der varer mere end 30 dage.

§ 3. Det særlige tillæg andrager 30 kr. for hver mønstringsdag på fiskeri, der varer mere end 30 dage.

§ 4. Lønudligningsfonden administrerer denne lov.

§ 5. Neyðug prógvskjøl viðvíkjandi mynstringartíðarskeiði verða at lata Lønjavningargrunninum saman við umsókn um viðbót.
Stk. 2. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um hvussu skipanin skal vera umsitin.

§ 6. Serliga viðbótin er skattskyldug inntøka.

§ 7. Lógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 5. Fyldestgørende dokumentation vedrørende mønstringsperioder skal indleveres til lønudligningsfonden sammen med ansøgning om tillæg.
Stk. 2. Landsstyret fastsætter nærmere regler om ordningens administration.

§ 6. Det særlige tillæg er skattepligtig indtægt.

§ 7. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:
Ásannandi at neyðug heimild at gjalda út serliga viðbót fyri telefonútreiðslur til langfarafiskimenn er ikki til, setur Føroya Landsstýri eftir avtalu við løgtingsins fíggjarnevnd fram uppskot til løgtingslóg um at útvega neyðugu heimildina.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

ad § 1.
Vísandi til, at ætlan fíggjarnevndarinnar var at útvega heimildina gjøgnum tekstviðmerkingarnar á sjálvari fíggjarlógini, og at slík heimild má endurnýggjast á hvørjum ári verður við hesum bert útvegað heimild at gjalda viðbót fyri mynstringardagar í árinum 1993.

ad § 3.
Reglan merkir, at fiskimaðurin skal ikki prógva, at hann hevur telefon ella hevur útreiðslur til telefon ella telefonsamtalur. 30 kr. verða at gjalda til ein hvønn, ið kann prógva, at hann í 1993 hevur verið mynstraður á føroyskum fiskiskipi á túri/túrum, sum hevur/hava vart meira enn 30 dagar hvør sær.

ad § 5.
Skjøl latin Lønjavningargrunninum í sambandi við skipanina við minstuløn verður góðkent sum umsókn.

ad § 6.
Meiriluti fíggjarnevndarinnar hevur ynskt, at viðbótin er skattskyldug og er hetta eisini í tráð við, at viðbótin verður latin, uttan at tað skal prógvast, at útreiðslur hava verið.

1. viðgerð 28. desember 1993. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 17. februar 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tan 18. december 1993 og eftir 1. viðgerð 20. december

1993 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið, ið snýr seg um heimildina, ið eftir landsstýrisins fatan er neyðug fyri at avgreiða málið telefonviðbót til langfarafiskimenn, meðan neyðuga upphæddin er játtað á fíggjarløgtingslógini fyri 1993.

Nevnda upphæddin er upp á kr. 2,8 mió. Í meirilutaálitinum til fíggjarlógina 1993 er greitt frá støðu meirilutans, ið eisini varð samtykt. Eingin tinglimur var undir viðgerðini ósamdur í hesum.

Um væntandi avgreiðsluna í fiskivinnudeildini er stutt at siga, at fíggjarnevnd Føroya løgtings nú sum áður hevur hildið seg eiga ta heimild, at tá eitt mál er samtykt av fíggjarnevndini, skal umsitingin, t.e. avvarðandi landsstýrismaður, avgreiða málið til tann ella tey, ið varða av ella eru adressatar fyri játtanini. Hetta er eisini galdandi rættarskipan í Danmark, bæði í praksis og á lærdu háskúlunum.

Um játtanina upp á kr. 2,8 mió. og heimildina at avgreiða, er eingin ivi. Tað er heldur eingin ivi um, at fiskivinnudeild landsstýrisins einki hevur gjørt fyri at fáa gongd á málið. Undanførslan um eina væntandi tekstviðmerking er burturvið. Um hetta kortini hevði veruligan týdning, átti fiskivinnudeildin at sørgt fyri, at avvarðandi landsstýrismaður so skjótt, lógin varð kunngjørd, yvirfyri løgtinginum gjørdi vart við fatan sína og grundgeving fyri ikki at avgreiða eina játtan á fíggjarlógini.

Fyriliggjandi lógaruppskot er lagt fram næstan eitt ár ov seint, ikki fyri 2. december 1993, hetta skuldi verið gjørt í januar 1993. Landsstýrið hevur nú lagt fram uppskot til eykafíggjarlóg fyri 1993.

Í hesum uppskoti eru tær 2,8 mió. við. Hertil er at siga, at er hesin peningur ikki nýttur í 1993, og tað er hann ikki, so er rætta gongdin at yvirflyta hesa játtan til 1994 - sum vanliga játtan. Er peningurin nýttur í 1993, men til annað endamál, t.v.s. uttan heimild, so ber ikki til hjá landsstýrinum at biðja løgtingið um eykajáttan til telefonviðbótina, tí tann játtanin er givin áður á fíggjarlógini. So má landsstýrið finna peningin innanfyri egnar karmar.

Í sambandi við § 1, stk. 2 í niðanfyristandandi broytingaruppskot, vísir fíggjarnevndin á, at í áliti til fíggjarløgtingslógina fyri 1993, segði meirilutin, at telefonviðbótin skuldi verða 30 kr. um dagin, og at teir, sum eru mynstraðir í 30 dagar ella meiri, eru at rokna sum langfarafiskimenn.

Niðurstøðan má vera, at løgtingið má við lóg
1. geva telefonviðbót til langfarafiskimenn fri 1993 at umsita av landsstýrinum eftir ásettum reglum.
2. at útreiðslan kr. 2,8 mió. verður strikað á eykafíggjarlógini fyri 1993 og tikin við sum eykajáttan í 1994.

Ein samd fíggjarnevnd setir sostatt í staðin fyri uppskot landsstýrisins fram soljóðandi

u p p s k o t

til

løgtingslóg um serliga viðbót til langfarafiskimenn.

§ 1. Langfarafiskimenn hava fyri árið 1993 rætt til serliga viðbót fyri telefonútreiðslur.
Stk. 2. Landsstýrið ásetir nærri reglur viðvíkjandi umsitingini av hesi lóg.

§ 2. Játtanin á fíggjarlógini 1993 upp á kr. 2.800.000 verður flutt til avvarðandi rakstrarstað á fíggjarlógini fyri 1994.

§ 3. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om særligt tillæg til fiskere på fjernfiskeri.

§ 1. Fiskere på fjernfiskeri har ret til for året 1993 at oppebære særligt tillæg vedrørende telefonudgifter.
Stk. 2. Landsstyret fastsætter nærmere regler for administration af denne lov.

§ 2. Bevillingen på finansloven 1993 på kr. 2.800.000 overføres til vedkommende driftskonto for finansloven for 1994.

§ 3. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Tordur J. Niclasen hevur annars hesar viðmerkingar:

Í fíggjarlógini fyri 1994 er til játtanina "inntøkutrygd til fiskimenn" settar kr. 87 mió.

Undir viðgerðini í fíggjarnevndini av hesum máli er staðfest, at landsstýrið ongar ætlanir hevur at veita endurgjald fyri telefonútreiðslur hjá langfarafiskimonnum fyri árið 1994.

Hetta tykist óskiljandi, tá hugsað verður um, hvør orsøkin var til, at samgongumeirilutin í fíggjarnevndini fyri ári síðani mælti til, at upphædd varð játtað til endamálið.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) er av teirri áskoðan, at henda viðbót ikki varð ætlað bert at galda tað eina árið, og skjýtur tí upp soljóðandi

U p p s k o t

til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka neyðug stig til, at serliga viðbótin fyri telefonútreiðslur hjá langfarafiskimonnum eisini kemur at galda frá árinum 1994 og framyvir.

Annars verður víst til áheitanir, viðmerkingar og skriv frá Fiskimannafelag Føroya til málið um viðbót til telefonútreiðslur hjá langfarafiskimonnum, sum nú loksins, ið hvussu so er fyri 1993, tykist at vera komið upp á pláss.

2. viðgerð 23. februar 1994. Uppskotið frá fíggjarnevndini í staðin fyri landsstýrisuppskotið samtykt við 24-0 atkvøðum. Uppskotið frá T. J. Niclasen fall við 6-0 atkvøðum.

3. viðgerð 25. februar 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

Lóg nr. 32 frá 23. mars 1994.

FL jnr. 1525-2/90.

50 Ígildissetan fyri Føroyar av "Lov om ændring af forskellige love for Færøerne om sociale ydelser"

Ár 1993, leygardagin 18. desember legði løgmaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið mælir ríkismyndugleikunum til, at uppskot til "Lov om ændring af forskellige love for Færøerne om sociale ydelser. (satsregulering)" verður sett í gildi í Føroyum.

Viðmerkingar:
Í Danmark hevur Fólkatingið fyrr í ár samtykt ein skattareform. Ein avleiðing av hesum er, at m.a. almannaveitingar frá 1. januar 1994 verða javnaðar (reguleraðar) á einum øðrum grundarlagi enn higartil.

Satsurin fyri 1994 er settur til minus 2,0 %

Í føroysku fólka- og avlamispensiónslógunum, umframt í lógini um barnagjald til stakar uppihaldarar, er ásett, at veitingar sambært lógini verða javnaðar samsvarandi tí, sum er galdandi í Danmark.

Verða lógirnar tí ikki broyttar, merkir hetta, at hesar veitingar pr. 1. januar 1994 eiga at verða lækkaðar við 2 %.

Ætlan landsstýrisins hevur ikki verið, at hesar veitingar skuldu lækkast, og í uppskoti til

fíggjarlóg fyri 1994 er upphæddin til hesar veitingar ásett út frá, at veitingarnar verða óbroyttar í 1994 í mun til 1993.

Av tí at tað er so langt útliðið á árinum kann ikki væntast, at lógarbroytingin kann verða samtykt bæði í løgtinginum og Fólkatinginum áðrenn 1. januar 1994. Landsstýrið roknar tó við, at lógarbroytingin kann verða avgreidd í januar mánaða 1994, og tað eru frá danskari síðu ikki komnar nakrar ábendingar um, at hetta ikki kann lata seg gera.

Sambært galdandi lógum eiga veitingarnar sambært lógunum at lækka 2 %.

Landsstýrið hevur á fundi tann 15. desember 1993 samtykt, at veitingar sambært hesum lógunum fyri **januar mánaða 1994** verða útgoldnar við fyrivarni um eftirregulering.

Hendan samtykt er grundað á, at landsstýrið heldur, at tað ikki er rímiligt at nýta stóra umsitingarliga orku til at regulera allar pensiónir (umleið 7.000) umframt barnagjøld einans fyri januar 1994, tá lógarbroyting longu er framløgd, ið skal heimila heimastýrinum við gildi frá 1. januar 1994 at áseta, at veitingarnar skulu verða óbroyttar í 1994 í mun til 1993. Ein tílík regulering nú vil vera bæði umsitingini og pensionistum o.ø. til óneyðugan bága.

Eftir umstøðunum heldur landsstýrið tí at tað er nøktandi, um Almannastovan saman við útgjalding av óbroyttum veitingunum fyri januar 1994 tekur fyrivarni um eftirregulering av 2 %, um so skuldi verið, at lógirnar ikki verða broyttar, sum skotið er upp av landsstýrinum.

1. viðgerð 21. desember 1993. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 18. februar 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. december 1993 og eftir 1. viðgerð 28. december 1993 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og **er samd** um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 22. februar 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

51 Løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap

Ár 1993, leygardagin 18. desember legði Thomas Arabo, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

Kapittul 1
Lógarøki, endamál og allýsingar v.m.

§ 1. Lógin fevnir um vinnuligt at gagnnýta livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum og hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi á sjólciðum uttan fyri føroysku landleiðirnar. Lógin fevnir ikki um at gagnnýta hval, kóp, fugl og alifisk.

§ 2. Livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum og tey rættindi, føroyska heimastýrið við samráðingum hevur uppnátt ella eftir altjóða rætti eigur uttan fyri føroysku landleiðirnar, eru ogn Føroya fólks. Dentur verður lagdur á, í umsitingini av hesi lóg, at varðveita tilfeingið og at troyta og gagnnýta hetta burðardygt á skilabesta hátt, lívfrøðiliga og búskaparliga, við virðing fyri sambandinum millum ymisku dýra- og plantustovnarnar í havinum og meingi teirra, til tess at tryggja besta samfelagsbúskaparliga ískastið frá fiskivinnuni, støðugar arbeiðs- og inntøkumøguleikar og møguleikar fyri vinnuligum virksemi um alt landið.

Stk. 2. Viðvíkjandi stovnum, sum ferðast um fiskimark ella bert ferðast í altjóðasjógvi, verður dentur lagdur á millumlandasamstarv í samljóð við altjóða havrættin og á at samstarva við onnur lond um skipan fyri fiskiskapi á ávísum havleiðum og eftir ávísum fiskasløgum, fyri at tryggja somu endamál, sum nevnd eru í stk. 1 í hesi grein.

lagtingslov om erhvervsmæssigt fiskeri.

Kapitel 1
Lovens område, formål og definitioner m.v.

§ 1. Loven omfatter erhvervsmæssig udnyttelse af de levende ressourcer på det færøske fiskeriterritorium og for fiskefartøjer under færøsk flag på havområder udenfor det færøske fiskeriterritorium. Loven omfatter ikke udnyttelse af hvaler, sæler, fugle og opdrætsfisk.

§ 2. De levende ressourcer på det færøske fiskeriterritorium og de rettigheder, det færøske hjemmestyre ved forhandlinger eller efter international ret besidder udenfor det færøske fiskeriterritorium, er det færøske folks ejendom. Der lægges vægt på ved administrationen af denne lov at bevare ressourcerne og at udnytte disse bæredygtigt på bedste måde, biologisk og økonomisk med respekt for sammenhængen mellem de forskellige dyre- og plantebestande i havet og mængden af disse, for at sikre det bedst mulige bidrag til samfundsøkonomien fra fiskerierhvervet, stabile arbejds- og indtægtsmuligheder og muligheder for økonomisk virksomhed over hele landet.

Stk. 2. For bestande, der færdes på tværs af fiskerigrænser eller kun lever i internationalt farvand, lægges vægt på internationalt samarbejde i overensstemmelse med den internationale havret og på samarbejde med andre lande om organisering af fiskeriet inden for bestemte havområder og efter bestemte fiskearter, for at sikre de

Stk. 3. Landsstýrið kann seta nevnd, mannaða við fiski- og útróðrarmonnum, fiskifrøðingum og fiskivinnubúskaparfrøðingum at hava umsjón við, at endamálsorðingarnar í hesi grein vera fylgdar og gera tilmæli til landsstýrið um møgulig stig, sum stuðla upp undir, at endamálini verða rokkin.

§ 3. Rættindi til fiskiskap sambært hesi lóg fevna um veiðu við fiskiførum undir føroyskum flaggi eftir dýrum og plantum á føroysku landleiðunum og á havleiðum uttan fyri føroyskt fiskimark, og við fiskiførum undir fremmandum flaggi á føroysku landleiðunum.
Stk. 2. Fiskirættindi latin sambært hesi lóg veita ikki einstøkum bólkum ella einstaklingum ognarrætt. Somuleiðis kunnu rættindi til fiskiskap takast aftur.

§ 4. <u>Føroyska ytra landleiðin</u> er sjógvurin innanfyri linju, sum gongur 200 fjórðingar (1 fjórðingur = 1852 metrar) frá beinum grundlinjum drignar gjøgnum hesi 12 støðini í tilskilaðu raðfylgjuni:

1. Sker í útsynning úr Munkinum.
   61°20'19''306 N,
   6°40'06''790 W.
2. Vestasti endi á Knúpi út fyri Fámará.
   61°28'34''772 N,
   6°52'18''834 W.
3. Vestasta skerið út fyri Mykines vita.
   62°05'46''439 N,
   7°41'25''623 W.
4. Útnyrðingsendi á skeri í útnyrðing úr Mykines vita.
   62°05'52''783 N,
   7°41'12''936 W.
5. Útnyrðingsendi á skeri í útnyrðing úr Mýlingi (Skeiðið).
   62°18'19''856 N,
   7°12'59''409 W.
6. Útnyrðingsendi á Kallsfles norður úr K a l l i .
   62°22'26''968 N.

samme formål, der er nævnt i stk. 1 i denne paragraf.
Stk. 3. Landsstyret kan nedsætte et udvalg, bestående af fiskere, fiskeribiologer og fiskeriøkonomer til at sikre, at formålserklæringerne i denne paragraf bliver fulgt, og afgive indstilling til landsstyret om eventuelle foranstaltninger, der støtter formålenes opfyldelse.

§ 3. Rettigheder til fiskeri ifølge denne lov omfatter fiskeri med fiskefartøjer under færøsk flag efter dyr og planter på det færøske fiskeriterritorium og på havområder udenfor det færøske fiskeriterritorium, og med fiskefartøjer under fremmed flag på det færøske fiskeriterritorium.
Stk. 2. Fiskerirettigheder i henhold til denne lov tildeler ikke enkelte grupper eller enkelte personer ejendomsret. Ligeledes kan rettigheder til fiskeri inddrages.

§ 4. <u>Det ydre færøske fiskeriterritorium</u> er farvandet inden for en linie, der går 200 sømil (1 sømil = 1852 meter) fra lige basislinjer, der trækkes gennem disse 12 punkter i følgende rækkefølge:

1. Skær sydvest for Munkurin
   61°20'19''306 N,
   6°40'06''790 W.
2. Vestenden på Knúpur ud for Fámará
   61°28'34''772 N,
   6°52'18''834 W.
3. Det vestligste skær ud for Mykines fyr
   62°05'46''439 N,
   7°41'25''623 W.
4. Nordvestenden af skær nordvest for Mykines fyr
   62°05'52''783 N,
   7°41'12''936 W.
5. Nordvestenden af skær nordvest for Mýling (Skeiðið)
   62°18'19''856 N,
   7°12'59''409 W.
6. Nordvestenden af Kallsfles nord for Kallur
   62°22'26''968 N,

6°48'18''806 W.

7. Sker norður úr Ennibergi.
62°23'49''299 N,
6°33'38''438 W.
8. Skoparin undir Norðbergi á Fuglovnni.
62°21'16''163 N,
6°17'59''058 W.
9. Landnyrðingshornið á Fugloynni.
62°20'40''637 N,
6°15'16''003 W.
10. Eystasta hornið á Bispinum eystanfyri Fugloynna.
62°20'27''398 N,
6°15'00''521 W.
11. Eystasti endi á Munka-flesjunum.
61°20'30''124 N,
6°39'30''108 W.
12. Sunnasti endi á Stórufles við Munkin.
61°20'26''953 N,
6°39'33''711 W.

Koordinatini frammanfyri vísa til European Datum (1. revisión 1950).

Stk. 2. Har minni enn 400 fjórðingar eru úr strondum Føroya til strendur Íslands, Noregs og Stórabretlands verður fiskimarkið, um serstøk avtala ikki er gjørd, avmarkað eftir tí linju, ið allastaðni liggur eins langt frá næsta punkti á grundlinjunum við nevndu strendur (miðlinjan).

Stk. 3. <u>Innara landleiðin</u> er sjógvurin innanfyri beinar grundlinjur drignar gjøgnum hesi 12 støðini í tilskilaðu raðfylgjuni:

1) Sker í útsynning úr Munkinum
61°20'19''306N,
06°40'06''790 W.
2) Vestasti endi á Knúpi út fyri Fámara
61°28'34''772 W,
06°52'18''834 W.
3) Vestasta skerið út fyri Mykines vita
62°05'46''439N,
07°41'25''623W.
4) Útnyrðingsendi á skeri í útnyrðing úr Mykines vita.
62°05'52''783 N,
07°41'12''936 W.
5) Útnyrðingsendi á skeri í útnyrðing úr

6°48'18''806 W.

7. Skær nord for Enniberg
62°23'49''299 N,
6°33'38''438 W.
8. Skoparin under Norðberg på Fugloy.
62°21'16''163 N,
6°17'59''058 W.
9. Nordøsthjørnet på Fugloy.
62°20'40''637 N,
6°15'16''003 W.
10. Østhjørnet på Bispurin øst for Fugloy.
62°20'27''398 N,
6°15'00''521 W.
11. Østenden på Munkaflesjunum.
61°20'30''124 N,
6°39'30''108 W.
12. Sydenden på Stórafles ved Munkurin.
61°20'26''953 N,
6°39'33''711 W.

Koordinaterne ovenfor henviser til European Datum (1. revision 1950).

Stk. 2. Hvor afstanden er mindre end 400 sømil fra Færøerne til Islands, Norges og Storbritaniens kyster, skabes afgrænsningen af fiskeriterritoriet, hvis særlig aftale ikke er indgået, efter den linie, der overalt ligger lige langt fra næste punkt på basislinjerne ved de pågældende kyster (midtlinien).

Stk. 3. <u>Det indre fiskeriterritorium</u> er farvandet indenfor lige basislinjer der trækkes gennem disse 12 punkter i den angivne rækkefølge:

1) Skær sydvest for Munkurin.
61°20'19''306N,
06°40'06''790 W.
2) Vestligste ende på Knúpur ud for Fámara.
61°28'34''772 W,
06°52'18''834 W.
3) Vestligste skær ud for Mykines fyr.
62°05'46''439N,
07°41'25''623W.
4) Nordvestenden af skær nordvest for Mykines fyr.
62°05'52''783 N,
07°41'12''936 W.

Mýlingi (Skeiðið)
62°18'19''856 N.
07°12'59''409 W.

6) Útnyrðingsendi á Kallsfles norður úr Kalli
62°22'26''968 N,
06°48'18''806 W.

7) Sker norður úr Enniberg
62°23'49''299 N,
06°33'38''438 W.

8) Skoparin undir Norðbergi á Fugloynni
62°21'16''163 N,
06°17'59''058 W.

9) Landnyrðingshornið á Fugloynni
62°20'40''637 N,
06°15'16''003 W.

10) Eystasta Hornið á Bispinum eystanfyri Fugloynna
62°20'27''398 N.
06°15'00''521 W.

11) Eystasti endi á Munkaflesjunum
61°20'30''124 N,
06°39'30''108 W.

12) Sunnasti endi á Stórufles
61°20'26''953 N,
06°39'33''711 W.

Koordinatini frammanfyri vísa til European Datum (1. revisión 1950).

Stk. 4. Havleiðirnar uttan fyri føroysku landleiðirnar eru

1) NEAFC skipanarøkið, NAFO skipanarøkið og NASCO skipanarøkið og tær altjóðaleiðir, har Føroyska heimastýrið ikki hevur góðkent avtalur um skipan av fiskiskapi.
2) búskaparøkini hjá Kanada, Grønlandi, Íslandi, Noregi, Russlandi, Estlandi, Lettlandi, Litavia og Europeiska samveldinum og øðrum londum, sum Føroyar hava sínámillum fiskivinnuavtalur við.

§ 5. <u>Mest lovvda veiða</u> (MLV) sambært hesi lóg er tað tal og/ella tann nøgd í tonsum, rund vekt, av fiski og dýrasløgum, sum Fiskirannsóknarstovan mælir til

5) Nordvestenden af skær nordvest for Mýling (Skeiðið).
62°18'19''856 N,
07°12'59''409 W.

6) Nordvestenden på Kallsfles nord for Kallur.
62°22'26''968 N,
06°48'18''806 W.

7) Skær nord for Enniberg
62°23'49''299 N,
06°33'38''438 W.

8) Skoparin under Norðberg på Fugloy
62°21'16''163 N,
06°17'59''058 W.

9) Nordøsthjørnet på Fugloy
62°20'40''637 N,
06°15'16''003 W.

10) Østligste hjørne på Bispurin øst for Fugloy
62°20'27''398 N,
06°15'00''521 W.

11) Østligste ende af Munkaflesjunum
61°20'30''124 N,
06°39'30'' 108 W.

12) Sydligste ende på Stórafles ved Munkurin
61°20'26''953 N,
06°39'33''711 W.

Koordinaterne ovenfor henviser til European Datum (1. revision 1950).

Stk. 4. Havområderne udenfor de færøske fiskeriterritorier er

1) NEAFC området, NAFO området og NASCO området og de internationale havområder, hvor det færøske hjemmestyre ikke har godkendt aftaler om fiskeri.
2) Canadas, Grønlands, Islands, Norges, Ruslands, Estlands, Letlands, Litaviens og Den Europæiske Unions økonomiske zoner og de økonomiske zoner i andre lande, som Færøerne har bilaterale fiskeriaftaler med.

§ 5. <u>Højst tilladte fangst</u> (HTF) i henhold til denne lov er det tal og/eller den mængde i tons, rund vægt, af fisk og dyrebestande, som Fiskirannsóknarstovan

at veiða í einum fiskiári úr ávísum fiskastovni á føroysku landleiðunum. Við MLV sum grundarlag ásetur landsstýrið kvotuna fyri hvønn fiskastovn sær.

Stk. 2. Heildarkvota sambært hesi lóg er tann nøgd av fiski í tonsum, rund vekt,

1) landsstýrið, grundað á tilmæli frá Fiskirannsóknarstovuni, loyvir fiskiførum undir føroyskum flaggi at veiða í einum fiskiári úr ávísum fiskastovni á føroysku landleiðunum,
2) fiskifør undir føroyskum flaggi hava rættindi at veiða sambært árligum semjum í millumlandafiskivinnunevndum og sambært árligum avtalum eftir sínámillum fiskivinnusáttmálum við onnur lond.

Stk. 3. Veiðuloyvi sambært hesi lóg er góðkenning, ið Føroya Landsstýri veitir ávísum fiskifari at veiða á føroysku landleiðunum og á leiðum uttanfyri føroysku landleiðirnar. Veiðuloyvi verður útskrivað fyri eitt ár í senn.

Stk. 4. Fiskiloyvi sambært hesi lóg er tann rættur, sum Føroya Landsstýri hevur latið eigara av ávísum fiskifari, sum hevur veiðuloyvi sambært stk. 3, at veiða ávísa nøgd úr fiskastovnum á ávísum leiðum í ávísum fiskiári.

Stk. 5. Felags kvotupartur, bygdur á søgulig rættindi roknað út eftir reglunum í §§ 29 - 30, er tann prosentpartur av heildarkvotuni av ávísum fiskastovni, ið landsstýrið hevur sett av til at fiska hjá einum bólki av fiskiførum, undir einum.

Felags árskvota er felags kvotuparturin roknaður um til tons, rund vekt, av fiski.

Stk. 6. Egin kvotupartur, bygdur á søgulig rættindi roknað út eftir reglunum í §§ 29 - 30, er tann prosentpartur av felags árskvotu av ávísum fiskastovni, ið landsstýrið hevur latið persóni ella felagi rættin at fiska. Egin árskvota er egni kvotuparturin roknaður um til tons, rund vekt, av fiski.

Stk. 7. Hjáveiðukvota er kvotupartur, sum verður lutaður ognarum av fiskiførum ella bólkum av fiskiførum til, afturat egnari

anbefaler kan fanges i et fiskeriår af en bestemt fiskebestand på det færøske fiskeriterritorium. Med HTF som grundlag fastsætter landsstyret kvoten for hver fiskebestand.

Stk. 2. Totalkvote ifølge denne lov er den mængde fisk i tons, rund vægt, som

1) landsstyret efter indstilling fra Fiskirannsóknarstovan tillader fiskefartøjer under færøsk flag at fange i et fiskeriår af en bestemt fiskebestand på det færøske fiskeriterritorium,
2) fiskefartøjer under færøsk flag har fået tildelt ret til at fange i henhold til årlige overenskomster i internationale fiskerikommissioner og i henhold til årlige aftaler ifølge bilaterale fiskeriaftaler med andre lande.

Stk. 3. Fangsttilladelse i henhold til denne lov er den godkendelse, som Færøernes landsstyre tildeler et bestemt fiskefartøj til fangst på det færøske fiskeriterritorium og i havområder udenfor det færøske fiskeriterritorium. Fangsttilladelsen udskrives for ét år ad gangen.

Stk. 4. Fiskeritilladelse i henhold til denne lov er den ret, som Færøernes landsstyre har givet ejeren af et bestemt fiskefartøj, som har fangsttilladelse i henhold til stk. 3, til at fiske en bestemt mængde af fiskebestande på bestemte områder i et bestemt fiskeriår.

Stk. 5. Fælles kvoteandel bygget på historiske rettigheder udregnet efter reglerne i §§ 29-30 er den procentdel af totalkvoten af en bestemt fiskebestand, som landsstyret har afsat til fiskeri af en særlig angivet gruppe fiskefartøjer under et.

Fælles årskvote er fælles kvoteandelen omregnet til tons, rund vægt, fisk.

Stk. 6. Individuel kvoteandel, bygget på historiske rettigheder udregnet efter reglerne i §§ 29-30, er den procentdel af en fælles årskvote af en bestemt fiskebestand, som landsstyret har tildelt person eller et selskab retten til at fiske. Individuel årskvote er den individuelle kvoteandel omregnet til tons, rund vægt fisk.

árskvotu ella felags árskvotu av høvuðsløgunum, sum fiskifarið ella bólkurin av fiskiførum roynir eftir.
Stk. 8. Fiskiveiðueftirlitið er tann myndugleiki, sum landsstýrið leggur eftirlit við hesi lóg til.

§ 6. Um bert verður veitt til persónliga nýtslu krevst ikki veiðu- ella fiskiloyvi.

Kapittul 2
Almennar reglur fyri fiskiskapi

§ 7. Vinnuligur fiskiskapur sambært hesi lóg kann bert fara fram við fiskiførum, sum sambært ognarviðurskiftunum eru heimahoyrandi í Føroyum og hava veiðuloyvi eftir § 5, stk. 3. Fyri at eiga fiskifar undir føroyskum flaggi krevst, at ognararnir eru:
1) Einkultpersónar, einkultpersónar í felagsskapi, sum hefta persónligt, solidariskt og beinleiðis og sum lúka treytirnar í stk. 2,
2) ella feløg, sum lúka treytirnar í stk. 3.

Stk. 2. Ognararnir sambært stk. 1 skulu hava fast tilknýti til Føroyar, allir skulu vera skrásettir í fólkayvirlitinum seinastu tvey árini, og allir skulu vera fult skattskyldugir í Føroyum.
Stk. 3. Um ognararnir sambært stk. 2 eru skipaðir í felagi, skal tað lúka fylgjandi treytir:
1) Felagið skal vera partafelag, smápartafelag, lutafelag ella partsreiðarí. Er talan um partafelag ella smápartafelag, skulu partabrøvini vera navnapartabrøv.
2) Ognararnir skulu eiga í minsta lagi 2/3 av ognarpeninginum og skulu uppfylla treytirnar í stk. 2.
3) Føroya landsstýri skal hava upplýs-

Stk. 7. Bifangstkvote er en kvoteandel, der tildeles ejere af fiskefartøjer eller grupper af fiskefartøjer, i tillæg til egen årskvote eller fælles årskvote af hovedsorterne, som fiskefartøjet eller gruppen af fiskefartøjer driver fiskeri efter.
Stk. 8. Fiskerikontrollen er den myndighed til hvilken landsstyret lægger tilsynet med denne lov.

§ 6. Hvis der kun fiskes til personligt brug, kræves ikke fangst- eller fiskeritilladelse.

Kapitel 2
Almindelige regler for fiskeriet

§ 7. Erhvervsmæssigt fiskeri i henhold til denne lov kan kun drives med fiskefartøjer, som ifølge ejerforholdene er hjemmehørende på Færøerne og har fangsttilladelse jfr. § 5, stk. 3. For at kunne eje et fiskefartøj under færøsk flag kræves, at ejerne er:
1) Enkeltpersoner, enkeltpersoner i selskabsform, der hæfter personligt, solidarisk og direkte og som opfylder betingelserne i stk. 2,
2) eller selskaber, der opfylder betingelserne i stk. 3.

Stk. 2. Ejerne i henhold til stk. 1 skal have fast tilknytning til Færøerne, alle skal have været registrerede i folkeregisteret på Færøerne de seneste 2 år, og alle skal være fuldt skattepligtige på Færøerne.
Stk. 3. Hvis ejerne i henhold til stk. 2 er organiserede i selskabsform, skal dette opfylde følgende betingelser:
1) selskabet skal være et aktieselskab, anpartsselskab, andelsselskab eller partsrederi. Er der tale om aktieselskab eller anpartsselskab, skal aktierne være noterede på navn.
2) Ejerne skal eje mindst 2/3 af egenkapitalen og skal opfylde betingelserne i stk. 2.
3) Færøernes Landsstyre skal have

ingar um hesi viðurskifti og skal góðkenna broytingar í ognarviðurskiftunum.

4) Landsstýrið kann í heilt serstøkum førum gera undantøk viðvíkjandi treytunum sambært hesi grein.

Stk. 4. Persónar og feløg, sum hava rikið fiskifør í 1993 og undan, kunnu halda áfram við virksemi sínum hóast ásetingarnar í stk. 1 - 3, treytað av, at tey fiskifør, tey hava rikið, hava fingið veiðuloyvi frá landsstýrinum fyri árið 1993.

§ 8. Bert persónar og feløg, ið eiga fiskifør, ið hava veiðuloyvi sambært § 5, stk. 3 kunnu fáa rættindi sambært § 5, stk. 4 - 7.

Stk. 2. Verður fiskifar við veiðuloyvi lagt med alla, er ræðisavmarking skrásett í skipaskránni ella farið er strikað í skipaskránni, kann landsstýrið eftir umsókn loyva, at veiðuloyvið verður flutt til annað fiskifar, sum er í flotanum frammanundan.

Stk. 3. Veiðiloyvi frá fiskifari, ið er lagt med alla, har ræðisavmarking er skrásett í skipaskránni, ella farið er strikað í skipaskránni, kann verða flutt til innflutt fiskifar við somu ella minni orku og sum ikki er eldri enn 10 ár.

§ 9. Landsstýrinum verður heimilað í kunngerð at skipa fyri fiskiskapi hjá fiskiførum undir føroyskum og fremmandum flaggi á føroysku landleiðunum og fiskiskapi hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi uttanfyri landleiðirnar og kann landsstýrið m.a. gera reglur um:

1) Heildarkvotu fyri ávísar fiskastovnar.
2) Býtið av felags árskvotum, sum ikki verða skiftar í egnar árskvotur, eftir fiskitíð.
3) Býtið av heildarkvotu millum bólkar av fiskiførum, einstøk fiskifør og veiðihættir.

oplysninger om disse forhold og skal godkende ændringer i ejerforholdene.

4) Landsstyret kan i helt særlige tilfælde gøre undtagelse fra betingelserne i henhold til denne paragraf.

Stk. 4. Personer og selskaber, der har drevet fiskefartøjer i 1993 og inden da, kan fortsætte sin virksomhed trods bestemmelserne i stk. 1-3, på betingelse af, at de fiskefartøjer, de har drevet, har fået fangsttilladelse fra landsstyret for året 1993.

§ 8. Kun personer og selskaber, der ejer fiskefartøjer, der har fangsttilladelse i henhold til § 5, stk. 3, kan få rettigheder i henhold til § 5, stk. 4-7.

Stk. 2. Oplægges fiskefartøj med fangsttilladelse permanent, er en rådighedsbegrænsning registreret i skibsregisteret, eller fartøjet er slettet i skibsregisteret, kan landsstyret efter ansøgning tillade, at fangsttilladelsen flyttes til andet fiskefartøj, som i forvejen er i den færøske fiskeflåde.

Stk. 3. Fangsttilladelse fra fiskefartøj, der er oplagt permanent, hvor en rådighedsbegrænsning er registreret i skibsregisteret, eller fartøjet er slettet i skibsregisteret, kan flyttes til andet fiskefartøj med samme eller mindre kapacitet, og som ikke er ældre end 10 år.

§ 9. Landsstyret bemyndiges til i bekendtgørelse at regulere fiskeriet for fiskefartøjer under færøsk og fremmed flag på det færøske fiskeriterritorium og fiskeri for fiskefartøjer under færøsk flag udenfor fiskeriterritoriet og kan bl.a. udstede regler for:

1) Totalkvoter for bestemte fiskebestande.
2) Fordelingen af fælles årskvoter, der ikke fordeles som egne årskvoter, efter fiskeriperiode.
3) Fordelingen af totalkvote mellem grupper af fiskefartøjer, enkelte fiskefartøjer og fangstmetoder.

4) Skyldu at lata veiðufráboðan til eftirlitsendamál.
5) Hvussu fiskiskapurin skal fara fram, reglur um minstamát, friðað øki, friðingartíðir, fiskireiðskap og nýtslu hansara og veiðihættir.
6) Skipan við veiðu- og fiskiloyvum og avgreiðslugjald í hesum sambandi.
7) Vernd av ungfiski og hámark fyri íblanding av ungfiski.
8) Bann fyri at blaka veiði út aftur, og hvørji dýra- og plantuslóg koma undir hetta bann.
9) Hvussu mótroknað verður, um veitt verður út um kvotuna.

Stk. 2. Landsstýrinum er somuleiðis heimilað at skipa fyri fiskiskapi frá landi og í áum, vøtnum og løkum og í kunngerð áseta nærri reglur um minstamát, friðað øki, friðingartíðir, fiskireiðskap og nýtslu teirra, fiskihættir, avmarking av veiðinøgd, veiðiorku og onnur tiltøk.

§ 10. Virking og handfaring av veiðu og veiðuvøru burtur úr fiskastovnum, sum eru undir kvotu, umborð á fiskiførum undir føroyskum flaggi á føroysku landleiðunum er bannað. Fyri aðrar dýrastovnar krevst loyvi landsstýrisins.
Stk. 2. Virking og handfaring av veiðu og veiðuvøru á føroysku landleiðunum umborð á fiskiførum undir fremmandum flaggi kann bert fara fram við landsstýrisins loyvi.
Stk. 3. Umskiping av veiðu ella veiðuvøru frá fiskiførum undir føroyskum flaggi til fiskifør við tilvirkingar- ella handfaringarloyvi ella til fiskifør undir fremmandum flaggi kann bert fara fram við landsstýrisins loyvi.
Stk. 4. Tað er ikki loyvt at blaka veiðu fyri borð.
Stk. 5. Á landleiðunum er tað bannað fiskiførum, sum eru undir fremmandum

4) Pligt til at indlevere fangstrapport til kontrolformål.
5) Hvordan fiskeriet skal foregå, regler om mindstemål, fredede områder, fredningstider, fiskeredskaber og deres benyttelse, samt fangstmetoder.
6) Ordning vedrørende fangst- og fiskeritilladelser og ekspeditionsgebyr i forbindelse hermed.
7) Beskyttelse af ungfisk og øvregrænse for, hvor stor en del ungfisken kan udgøre fangstmængden.
8) Forbud mod at kaste fangst i havet, og hvilke dyre- og plantearter der omfattes af dette forbud.
9) Modregning i tilfælde af kvoteoverskridelse.

Stk. 2. Landsstyret har ligeledes hjemmel til at regulere fiskeri fra land og i åer, indsøer og bække, og kan i bekendtgørelse udstede nærmere regler om mindstemål, fredede områder, fredningstider, fiskeredskaber og deres benyttelse, fiskerimetoder, begrænsning af fangstmængde, fangstkapacitet og andre foranstaltninger.

§ 10. Forarbejdning og håndtering af fangst og fangstprodukter af kvoterede fiskebestande ombord på fiskefartøjer under færøsk flag på færøsk fiskeriterritorium er forbudt. For andre dyrebestande kræves landsstyrets tilladelse.
Stk. 2. Forarbejdning og behandling af fangst og fangstprodukter på færøsk fiskeriterritorium ombord på fiskeskibe under fremmed flag kan kun foregå med landsstyrets tilladelse.
Stk. 3. Omskibning af fangst eller fangstprodukter fra fiskefartøjer under færøsk flag til fiskefartøjer med forarbejdningstilladelse eller tilladelse til videre behandling eller til fiskefartøjer under fremmed flag kan kun foregå med landsstyrets tilladelse.
Stk. 4. Det er ikke tilladt at smide fangst over bord.
Stk. 5. Det er forbudt fiskeskibe under fremmed flag og fremmede statsborgere på

flaggi og fremmandum ríkisborgarum at reka vinnuligan fiskiskap yvirhøvur, herundir fáast við slíkt, ið stendur í samband við fiskiskap, so sum umskiping av fongi, virking, pakking ella onnur handfaring av fiski ella fiskavøru, umskiping av útgerð ella ankring við tí í hyggju at taka lut í umskiping av fiski ella taka inn útgerð.

Stk. 6. Eisini er bannað fiskiførum, sum eru undir fremmandum flaggi og fremmandum ríkisborgarum, at koma á føroyskt sjóøki ella í føroyska havn uttan í skaðaleysari gjøgnumsigling, um so er, at tey hava brotið reglur fyri fiskiskapi uttan fyri føroysku landleiðirnar, sum fiskifør undir føroyskum flaggi sambært millumlanda avtalur eru bundin at halda. Somuleiðis er bannað at uppskipa ella innflyta fisk, ið fiskifør undir fremmandum flaggi hava veitt ímóti avtalum um samstarv um at varðveita tilfeingi, á leiðum har Føroyar eru bundnar av líkari avtalu.

Stk. 7. Landsstýrinum er heimilað at gera undantak frá forboðnum í stk. 5.

fiskeriterritoriet overhovedet at udføre erhvervsmæssigt fiskeri, herunder foretage sig noget, der har forbindelse med fiskeri, så som omladning af fangst, forarbejdning, pakning eller anden håndtering af fisk eller fiskeprodukt, omladning af udrustning eller opankring med den hensigt at tage del i omladning af fisk eller ombordtagning af udrustning.

Stk. 6. Det er også forbudt fiskefartøjer under fremmed flag og fremmede statsborgere at komme ind på færøsk søterritorium eller i færøsk havn undtagen i skadesløs gennemsejling, i tilfælde af, at de har overtrådt regler for fiskeri udenfor færøsk fiskeriterritorium, som fiskefartøjer under færøsk flag i henhold til internationale aftaler er forpligtede til at overholde. Ligeledes er det forbudt at opskibe eller importere fisk, der er fanget af fiskefartøjer under fremmed flag i strid med aftaler om samarbejde om at bevare ressourcer på territorier, hvor Færøerne er bundet af en sådan aftale.

Stk. 7. Landsstyret er bemyndiget til at dispensere fra forbudet i stk. 5.

§ 11. Fiskifør undir føroyskum flaggi kunnu ikki fara til vinnuligan fiskiskap á føroysku landleiðunum uttan at hava veiðuloyvi og fiskiloyvi sambært § 5, stk. 3 og 4.

Stk. 2. Til vinnuligan fiskiskap við fiskiførum undir føroyskum flaggi eftir fiskasløgum, ið koma undir heildarkvotu sambært § 5, stk. 2, krevst, umframt veiðuloyvi og fiskiloyvi, sum nevnt í stk. 1, ræði yvir kvotum, sambært § 5, stk. 5-7.

Stk. 3. Fiskiskapur við fiskiførum undir føroyskum flaggi uttanfyri føroysku landleiðirnar á havleiðuntum nevndar í § 4, stk.4 kann bert fara fram við loyvi frá Føroya landsstýri, og kann landsstýrið í loyvinum áseta nærri treytir fiskiskapinum viðvíkjandi.

Stk. 4. Fiskifør undir fremmandum flaggi kunnu bert veiða á føroysku landleiðunum við loyvi frá landsstýrinum, sambært

§ 11. Fiskefartøjer under færøsk flag kan ikke påbegynde erhvervsmæssigt fiskeri på færøsk fiskeriterritorium uden fangsttilladelse og fiskeritilladelse ifølge § 5, stk. 3 og 4.

Stk. 2. Til erhvervsmæssigt fiskeri med fiskefartøjer under færøsk flag efter fiskesorter, der kommer under totalkvote i henhold til § 5, stk. 2, kræves, udover fangsttilladelse og fiskeritilladelse, som nævnt i stk. 1, rådighed over kvoter i henhold til § 5, stk. 5-7.

Stk. 3. Fiskeri med fiskefartøjer under færøsk flag udenfor færøsk fiskeriterritorium på hvområderne, der er nævnt i § 4, stk. 4, kan kun foregå med tilladelse fra Færøernes Landsstyre og landsstyret kan i tilladelsen fastsætte nærmere betingelser vedrørende fiskeriet.

Stk. 4. Fiskefartøjer under fremmed flag kan kun fiske på færøsk fiskeriterritorium

sínámillum fiskiveiðuavtalur.

Kapittul 3
Reglur um kvoturættindi

§ 12. Rætturin til egnan kvotupart á føroysku landleiðunum hevur gildi í 10 ár, og er landsstýrinum heimilað at leingja rættin eftir umsókn.

§ 13. Eingin kann eiga ella ráða yvir meira enn 10% av øllum heildarkvotunum á føroysku landleiðunum.

§ 14. Landsstýrinum er heimilað at áseta avgjald fyri kvoturættindi fyri hvørt fiskiár sær. Tá avgjaldsupphæddin verður áset skal mesti dentur leggjast á tilfeingisrentuna.

§ 15. Egin kvotupartur kann seljast ella leigast út til aðrar, um teir lúka treytirnar í lógini annars, við teimum avmarkingum, sum eru ásettar í stk. 2 og § 16 og § 17. Søla og leiga kann fara fram fyri 3 fiskitíðir, januar-apríl, mai-september og oktober-desember. Landsstýrið skal hava frá um og góðkenna søluna ella leigu, áðrenn farið verður út at fiska keyptu ella leigaðu kvotuna. Kvotuparturin kann ikki setast í veð.
Stk. 2. Kvotur ella partur av kvotum kunnu ikki leigast út í meira enn 2 ár.

§ 16. Landsstýrið ásetur reglur um, á hvønn hátt kvotur kunnu leigast, keypast ella seljast og flytast millum bólkar av fiskiførum og veiðihættir.
Stk. 2. Egnir kvotupartar, sum eru grundaðir á veiðu við útróðrarbáti, kunnu bert seljast ella leigast øðrum útróðrarbátum.
Stk. 3. Landsstýrið kann í kunngerð áseta reglur um, at persónar og felløg í einari sýslu hava framíhjárætt til at bjóða, tá fiskifør úr sýsluni verða seld.

med landsstyret. Hjemmel i henhold til bilaterale fiskeriaftaler.

Kapitel 3
Regler om kvoterettigheder

§ 12. Retten til individuel kvoteandel på færøsk fiskeriterritorium gives for 10 år, og landsstyret kan efter ansøgning at forlænge denne ret.

§ 13. Ingen kan eje eller råde over mere end 10% af alle totalkvoter på færøsk fiskeriterritorium.

§ 14. Landsstyret er bemyndiget til at fastsætte afgift for kvoterettigheder for hvert fiskeriår. Ved fastsættelse af afgiftsbeløbet, skal der især lægges vægt på ressourcerenten.

§ 15. Individuel kvoteandel kan sælges eller udlejes til andre, såfremt disse opfylder lovens betingelser iøvrigt, med de begrænsninger, der er fastsat i stk. 2 og §§ 16 og 17. Salg og leje kan finde sted for 3 fiskeriperioder januar-april, maj-september og oktober-december. Salg eller leje skal meddeles og godkendes af landsstyret inden fiskeri af den købte eller lejede kvote påbegyndes. Kvoteandelen kan ikke pantsættes.
Stk. 2. Kvoter eller dele af kvoter kan ikke udlejes for mere end 2 år.

§ 16. Landsstyret fastsætter regler om, på hvilken måde kvoter kan lejes, købes eller sælges, og om på hvilken måde kvoter kan flyttes mellem grupper af fiskefartøjer og fangstmetoder.
Stk. 2. Individuelle kvoteandele, som er tildelt til fangst med kystfiskerfartøj, kan kun sælges eller lejes til andre kystfiskefartøjer.
Stk. 3. Landsstyret kan i bekendtgørelse fastsætte regler om, at personer og sel-

§ **17.** Kvoturættindi kunnu ikki arvast.

§ **18.** Um partur av heildarkvotu ikki er latin sum egin kvotupartur sambært § 5. stk. 6. kann landsstýrið leiga ella selja hann ella part av honum sum egnan kvotapart ella lata hann til endamál av almennum áhuga. Inntøkur frá hesum kunnu setast í grunn, sum kann nýtast til at fremja endamálini í hesi lóg.

§ **19.** Fiskiskapur skal steðga beinanvegin, tá ið egna árskvotan, felagsárskvotan ella hjáveiðukvotan er uppfiskað.
Stk. 2. Fiskiloyvi ella partar av fiskiloyvi detta burtur av sær sjálvum, tá ið kvotan er uppfiskað.

§ **20.** Landsstýrið kann gera av, at veiðunøgdir av ávísum fiskasløgum skulu hækkast við ávísum prosentparti, tá roknað verður, hvussu nógv av egnu árskvotuni ella felags árskvotuni er nýtt, um fiskurin verður avreiddur ella fluttur óvirkaður uttanlands. Óvirkaður fiskur er ósløgdur, sløgdur ella avhøvdaður fiskur, sama hvussu hann er goymdur.

§ **21.** Fiskirannsóknarstovan hevur loyvi at fremja vísindaligar fiskirannsóknir, við egnum ella leigaðum fiskiførum, uttan mun til reglurnar í hesi lóg.
Stk. 2. Royndarfiskiskapur krevur serstakt loyvi frá landsstýrinum. Landsstýrið kann áseta treytir fyri royndarfiskiskapi
Stk. 3. Landsstýrið kann uttan mun til galdandi avmarkingar í vinnuliga fiskiskapinum annars, loyva fiskiskapi sum liður í einari undirvísingar- og/ella menningarætlan.

§ **22.** Veiða úr stovnum, ið ikki koma undir heildarkvotu ella skipan við serligum fiskiloyvi, er loyvd fiskiførum við veiðuskaber i et syssel har fortrinsret til at byde, når fiskefartøjer i syslet er til salg.

§ **17.** Kvoterettigheder kan ikke arves.

§ **18.** Hvis del af totalkvote ikke er tildelt som individuel kvoteandel i henhold til § 5, stk. 6, kan landsstyret leje eller sælge den eller en del af den som individuel kvoteandel eller give den til formål af almen interesse. Indtægter heraf kan sættes i en fond, der kan benyttes til at opnå formål, fastsat i denne lov.

§ **19.** Fiskeri skal ophøre øjeblikkelig, når egen årskvote, fælles årskvote eller bifangstkvote er opfisket.
Stk. 2. Fiskeritilladelse bortfalder automatisk, når kvoten er opfisket.

§ **20.** Landsstyret kan afgøre, at fangstmængder af bestemte fiskesorter skal forhøjes med en vis procentdel, ved beregning af hvor stor en del af egen eller fælles årskvote, der er fisket, såfremt fisken udføres eller transporteres uforarbejdet til udlandet. Uforarbejdet fisk er urenset, renset eller hovedkappet fisk, uanset hvilken hvilken opbevaringsmåde, der anvendes.

§ **21.** Fiskirannsóknarstovan har tilladelse til at udføre videnskabelige fiskeriundersøgelser med egne eller lejede fiskefartøjer, uanset reglerne i denne lov.
Stk. 2. Forsøgsfiskeri kræver særlig tilladelse fra landsstyret. Landsstyret kan fastsætte betingelser for forsøgsfiskeri.
Stk. 3. Landsstyret kan, uanset gældende begrænsninger i det erhvervsmæssige fiskeri iøvrigt, tillade fiskeri som et led i en undervisnings- og/eller udviklingsplan.

§ **22.** Fiskeri af bestande, der ikke er omfattet af totalkvote eller ordning med særlig fiskeritilladelse er tilladt fiskefartø-

loyvi og fiskiloyvi sambært § 5, stk. 3 og 4. Fiskiskapurin skal fara fram eftir teimum reglum, ið eru ásettar av Føroya landsstýri sambært § 9.

Stk. 2. Tá loyvi verður givið til veiði sambært stk. 1, kann landsstýrið leggja dent á m.a. at bøta um trupul viðurskifti hjá persónum og feløgum, ið standast av kvotabýtinum.

Kapittul 4.
Ásetan av veiðurættindum á føroysku landleiðunum hjá teimum, sum eiga fiskifør undir føroyskum flaggi.

§ 23. Landsstýrið ásetur heildarkvotur fyri hvønn fiskastovn sær, hvørt fiskiárið, fyri fimm ár í senn, grundað á tilmæli frá Fiskirannsóknarstovuni. Heildarkvoturnar eru tær somu tey 5 fiskiárini, sum eru partur av einum 5 ára kvotuskeiði. Fiskiárið byrjar 1. januar og endar 31. desember. **Heildarkvotur** fyri komandi 5 ára kvotuskeið verða ásettar í seinasta lagi 1. september árið undan kvotuskeiðið byrjar.

Stk. 2. Á hvørjum ári letur Fiskirannsóknarstovan landsstýriuum frágreiðing um støðuna í teimum stovnum, sum verða gagnnýttir á føroysku landleiðunum, herundir serliga teimum, sum eru undir heildarkvotu. Í frágreiðingini mælir Fiskirannsóknarstovan til tiltøk, sum eru neyðug fyri at røkka endamálunum við hesi lóg. Frágreiðingin frá Fiskirannsóknarstovuni skal eisini fevna um hjáveiðu. Kemur Fiskirannsóknarstovan fram á, at lívfrøðiligu fortreytirnar, sum vóru galdandi tá heildarkvoturnar fyri 5 ár vórðu ásettar, eru munandi broyttar, skal hon gera nýtt tilmæli um mest loyvdu veiðuna í tí, sum er eftir av 5 ára tíðarskeiðinum. Mælir Fiskirannsóknarstovan til at broyta mest loyvdu veiðuna í kvotutíðarskeiðinum, skal landsstýrið skjótast gjørligt taka støðu til, um heildarkvoturnar skulu broytast tað.

jer med fangsttilladelse og fiskeritilladelse i henhold til § 5, stk. 3 og 4. Fiskeriet skal foregå efter de regler, der er fastsat af Færøernes Landsstyre i henhold til § 9.

Stk. 2. Når tilladelse gives til fangst i henhold til stk. 1, kan landsstyret lægge vægt på bl.a. at kompensere personer og selskaber, der har særlige problemer i den udstrækning, disse er opstået på grund af kvotefordelingen.

Kapitel 4
Fastsættelse af fangstrettigheder på det færøske fiskeriterritorium for ejere af fiskerfartøjer under færøsk flag

§ 23. Landsstyret fastsætter totalkvoter for hver enkelt fiskebestand hvert fiskeriår for 5 år ad gangen på grundlag af indstilling fra Fiskirannsóknarstovan. Totalkvoterne er de samme de 5 fiskeriår, der indgår i en 5 års kvoteperiode. Fiskeriåret begynder 1. januar og slutter 31. december. **Totalkvoter** for kommende 5 års kvoteperiode fastsættes senest 1. september året forinden kvoteperioden starter.

Stk. 2. Hvert år udarbejder Fiskirannsóknarstovan til landsstyret en redegørelse om tilstanden i de bestande som udnyttes på færøsk fiskeriterritorium, herunder særligt de bestande, som er omfattet af totalkvoten. I redegørelsen afgiver Fiskirannsóknarstovan indstilling om hvilke tiltag, der er nødvendige for at opnå formålene i denne lov. Redegørelsen fra Færøernes fiskeriundersøgelser skal også omfatte bifangster. I tilfælde af, at Fiskirannsóknarstovan finder, at de biologiske forhold, som var gældende, da totalkvoterne blev fastsat, er væsentligt ændrede, skal Fiskirannsóknarstovan afgive ny indstilling om højst tilladte fangst for den resterende del af 5-års perioden. I tilfælde hvor Fiskirannsóknarstovan afgiver indstilling om at ændre højst-tilladte fangst i kvoteperioden, skal landsstyret hurtigst muligt tage afgørelse om, hvorvidt totalkvoterne skal ændres i

sum eftir er af kvotaskeiðinum.
Stk. 3. Landsstýrið lenur frágreiðing til Føroya Løgting við øllum upplýsingum av týdningi viðvíkjandi ásetingini av mest loyvdu veiðu og heildarkvotum.
Stk. 4. Um landsstýrið ger broytingar í heildarkvotunum í 5 ára kvotaskeiðinum, verður frágreiðing um hetta latin løgtinginum.

den resterende del af kvoteperioden.
Stk. 3. Landsstyret giver Færøernes Lagting en redegørelse med alle oplysninger af betydning vedrørende fastsættelsen af højst tilladte fangst og totalkvoter.
Stk. 4. Såfremt landsstyret ændrer totalkvoterne i 5-års kvoteperioden, gives redegørelse herom til lagtinget.

Kapittul 5
Veiða á føroysku landleiðunum við fiskiførum, sum eru undir fremmandum flaggi.

§ 24. Hóast forboðnum í § 10, stk. 5 móti at fiskifør, sum eru undir fremmandum flaggi, og ríkisborgarar, sum ikki eru heimahoyrandi í Føroyum, reka vinnuligan fiskiskap á føroysku landleiðunum, kann landsstýrið loyva tilíkan fiskiskap sambært sínámillum fiskivinnuavtalum við onnur lond.
Stk. 2. Hóast kravið um, at bert fiskifør úr londum, sum Føroyar hava sínámillum fiskivinnuavtalu við, kunnu fáa loyvi at reka fiskiskap á føroysku landleiðunum, kann landsstýrið gera undantak frá hesi reglu, um tað tænir royndarendamálum ella er liður í royndum at menna nýggja veiði ella fiskavirking.

§ 25. Fiskifør undir fremmandum flaggi hava loyvi at veiða tær veiðunøgdir av ymiskum fiskastovnum undir Føroyum, sum eru avtalaðar millum myndugleikarnar í hesum londum og Føroya landsstýri á hvørjum ári.
Stk. 2. Fiskifør undir fremmandum flaggi kunnu bert byrja fiskiskap á føroysku landleiðunum, um tey eru á einum lista, sum heimland teirra hevur sent landsstýrinum við navni, skrásetingarnummari og øðrum neyðugum upplýsingum, áðrenn nýtt fiskiár byrjar. Broytingar kunnu gerast í listanum í fiskiárinum.

Kapitel 5
Fiskeri på færøsk fiskeriterritorium med fiskefartøjer under fremmed flag.

§ 24. Uanset forbudet i § 10, stk. 5, mod at fiskefartøjer, der er under fremmed flag, og statsborgere, der ikke er hjemmehørende på Færøerne, driver erhvervsmæssigt fiskeri på færøsk fiskeriterritorium, kan landsstyret tillade sådant fiskeri i henhold til bilaterale fiskeriaftaler med andre lande.
Stk. 2. Uanset kravet om, at kun fiskefartøjer fra lande, som Færøerne har bilaterale fiskeriaftaler med, kan få tilladelse til at drive fiskeri på færøsk fiskeriterritorium, kan landsstyret gøre undtagelser fra denne regel, hvis det tjener forsøgsformål eller er led i forsøg på at udvikle nye fiskerier eller fiskeforarbejdning

§ 25. Fiskefartøjer under fremmed flag har tilladelse til at fiske de fangstmængder af diverse fiskebestande ved Færøerne, der hvert år aftales mellem myndighederne i de respektive lande og Færøernes landsstyre.
Stk. 2. Fiskefartøjer under fremmed flag kan kun påbegynde fiskeri på færøsk fiskeriterritorium, såfremt de er opført på en liste, som deres hjemland har sendt landsstyret med navn, registreringsnummer og andre nødvendige oplysninger, inden nyt fiskeriår påbegyndes. Der kan foretages ændringer i fortegnelsen i fiskeriåret.

§ 26. Landsstýrið kann í kunngerð áseta nærri reglur um fiskiskap á føroysku landleiðunum hjá fiskiførum undir fremmandum flaggi við atliti at § 9 og sínámillum fiskivinnuavtalunum.

Kapittul 6.
Veiðurættindi uttan fyri føroysku landleiðirnar hjá teimum, sum eiga fiskifør, sum eru undir føroyskum flaggi.

§ 27. Veiðunøgdirnar, fiskifør undir føroyskum flaggi kunnu veiða uttanfyri føroysku landleiðirnar, verða ásettar fyri eitt ár í senn, sambært sínámillum fiskivinnuavtalum við onnur lond og semjum í millumlanda og altjóða fiskivinnunevndum. Landsstýrið kann luta hesar nøgdir út sum egnar kvotupartar, egnar árskvotur ella felagsárskvotur. Egnir kvotupartar og árskvotur koma undir somu reglur sum egnir kvotupartar og árskvotur á føroysku landleiðunum.

Stk. 2. Reglur og treytir fyri fiskiskapi eru tær, sum eru galdandi í fiskivinnuøkinum hjá teimum londum, sínámillum fiskivinnuavtala er gjørd við. Í altjóðasjógvi galda tær reglur, sum avtalaðar eru í millumlanda og altjóða fiskivinnunevndum.

Stk. 3. Landsstýrið boðar á hvørjum ári, áðrenn nýggja fiskiárið byrjar, ognarum av fiskiførum, sum hava veiðuloyvi í fremmandum sjógvi, frá veiðurættindum teirra.

Kapittul 7.
Skiftisreglur og ymiskar ásetingar.

§ 28. Heildarkvotur á landleiðunum fyri fiskifør undir føroyskum flaggi verða ásettar fyri hesar fiskastovnar fyri fyrsta 5 ára kvotuskeiðið, 1994 til 1998, fyri hvørt fiskiárið.

	Tons rund vekt:
Toskur á landgrunninum	6.800

§ 26. Landsstyret kan i bekendtgørelse fastsætte nærmere regler om fiskeri på færøsk fiskeriterritorium for fiskefartøjer under fremmed flag i overensstemmelse med § 9 og bilaterale fiskeriaftaler.

Kapitel 6.
Fiskerirettigheder uden for færøsk fiskeriterritorium for ejere af fiskefartøjer, der er under færøsk flag.

§ 27. Fangstmængderne, som fiskefartøjer under færøsk flag kan fiske uden for færøsk fiskeriterritorium, fastsættes for et år ad gangen, i henhold til bilaterale fiskeriaftaler med andre lande og overenskomster i bilaterale og internationale fiskerikommissioner. Landsstyret kan tildele disse mængder som individuelle kvoteandele, egne årskvoter eller fællesårskvoter. For individuelle kvoteandele og årskvoter gælder de samme regler som vedrørende individuelle kvoteandele og årskvoter på færøsk fiskeriterritorium.

Stk. 2. Regler og betingelser for fiskeri er de samme, som gælder for fiskeriterritorierne de lande, Færøerne har bilaterale fiskeriaftaler med. I internationalt farvand er de regler gældende, som er aftalt i internationale fiskerikommissioner.

Stk. 3. Landsstyret oplyser hvert år, inden det nye fiskeriår begynder, ejerne af fiskefartøjer, der har fangsttilladelse i fremmed farvand, om deres fangstrettigheder.

Kapitel 7.
Overgangsregler og forskellige bestemmelser.

§ 28. Totalkvoter på fiskeriterritoriet for fiskefartøjer under færøsk flag fastsættes for disse fiskebestande for den første 5-års kvoteperiode, 1994 til 1998, for hvert fiskeriår.

	Tons, rund vægt:
Torsk på landsokkelen	6.800

Toskur á Føroya Banka	1.400
Hýsa	6.000
Upsi	41.500
Kongafiskur	13.300
Longa	2.100

§ 29. Felags kvotupartar verða ásettir fyri hesar bólkar av fiskiførum á føroysku landleiðunum:
Ståltrolarar yvir 400 HK
Stállínuskip yvir 110 BRT
Útróðrarbátar yvir 20 BRT
Útróðrarbátar undir 20 BRT
Stk. 2. Felags kvotupartarnir verða roknaðir út frá meginregluni um søguligu veiðuna hjá hvørjum bólki í stk. 1. Tá lógin fær gildi verður prosentbýtið av teimum ymisku fiskastovnunum soleiðis:

Torsk på Føroya Banka	1.400
Kuller	6.000
Sej	41.500
Rødfisk	13.300
Lange	2.100

§ 29. Fælles kvoteandele fastsættes for disse grupper fiskefartøjer på færøsk fiskeriterritorium:
Ståltrawlere over 400 HK
Stållinebåde over 110 BRT
Kystfiskefartøjer over 20 BRT
Kystfiskefartøjer under 20 BRT
Stk. 2. Fælles kvoteandele beregnes ud fra princippet om historisk fangst for hver af de i stk. 1 nævnte grupper. Når loven træder i kraft fastsættes procentfordelingen af de forskellige fiskebestande således:

	Toskur Torsk	Hýsa Kuller	Upsi Sej	Kongafiskur Rødfisk	Longa Lange
Trol Trawl	20%	10%	78%	92%	27%
Línuskib Lineskibe	24%	29%	1%	3%	52%
Útróðrarbátar yvir 20 BRT Kystfiskefartøjer over 20 BRT	28%	28%	12%	2%	11%
Útróðrarbátar undir 20 BRT Kystfiskefartøjer under 20 BRT	25%	30%	8%	2%	7%
Onnur Andre	3%	3%	1%	1%	3%

§ 30. Innan fyri hvønn av bólkunum av fiskiførum í § 29, stk. 1, verður egni kvotuparturin hjá persóni ella felag roknaður út eftir veiðuni 4 tey bestu árini av árunum 1986 til 1992. Um fiskifar hevur fiskað í minni enn 4 ár, verða hesi ár nýtt.
Stk. 2. Ognarar av útróðrarbátum, 20 BRT ella meira, kunnu velja millum at fiska undir felags ella egnari árskvotu. Verður egin árskvota vald, verður egni kvotuparturin roknaður út eftir reglunum í stk. 1. Hevur ognari av útróðrarbáti, 20 BRT ella meira, valt egna árskvotu, kann hann ikki venda aftur til at fiska undir felags árskvotu.

§ 30. Inden for hver af de i § 29, stk. 1 nævnte grupper af fiskefartøjer, udregnes en persons eller et selskabs individuel kvoteandel efter fangsten de 4 bedste år i tidsrummet 1986 til 1992. Såfremt fiskerfartøj har fisket mindre end 4 år, benyttes disse år som beregningsgrundlag.
Stk. 2. Ejerne af kystfiskefartøjer, 20 BRT eller større, kan vælge mellem at fiske under fælles eller individuel årskvote. Vælges der individuel årskvote, udregnes den individuelle kvoteandel efter reglerne i stk. 1. Såfremt ejer af kystfiskerfartøj, 20 BRT eller mere, har valgt individuel årskvote, kan der ikke vendes tilbage til at

§ 31. Egnar kvotur, felags kvotur og beildarkvotur hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi uttan fyri landleiðirnar verða ásettar á sama hátt í 1994, sum í 1993.

§ 32. Talið av veiðuloyvum, sum fáa egna kvotu ella felagskvotu í hvørjum bólki av fiskiførum undir føroyskum flaggi, er tað talið, sum varð útskrivað frá landsstýrinum til fiskifør 20 BRT ella meira í 1993.

Kapittul 8.
Hagtøl v.m.

§ 33. Landsstýrið ásetur reglur um, at fiskiførum undir føroyskum flaggi og fiskakeyparum og øðrum, sum taka veiðu ella fiskavøru inn á goymslu, til umskipingar ella til at føra til avreiðingar uttanlands, verður álagt at lata inn veiðutøl, dagbøkur, vektarseðlar, upplýsingar um avreiðingar og aðrar upplýsingar um fiskiskap til hagfrøðilig og eftirlitsendamál.

Stk. 2. Landsstýrið kann áseta reglur um, at allar upplýsingar, sum verða kravdar eftir stk. 1., eisini skulu latast inn, tá veiða hjá útlendskum skipum verður løgd upp, fyribils goymd ella umskipað í Føroyum til at flyta víðari.

Kapittul 9.
Fiskiveiðueftirlitið.

§ 34. Fiskiveiðueftirlitið er stovnur undir landinum, hvørs endamál er at fyrisita fiskiveiðueftirlitinum sambært hesi lóg á sjógvi og landi. Landsstýrið ásetur nærri reglur um fiskiveiðueftirlit og um skipan av fiskiveiðueftirlitinum, herundir um eygleiðaraskipan. Landsstýrið kann heimila fiskiveiðueftirlitinum at fremja tær heimildir, sum landsstýrið hevur eftir hesi lóg.

tiske under fælles årskvote.

§ 31. Individuelle kvoter, fælles kvoter og totalkvoter for fiskefartøjer under færøsk flag uden for fiskeriterritoriet fastsættes på samme måde i 1994 som i 1993.

§ 32. Tallet af fangsttilladelser, som får tildelt egen kvote eller fælles kvote i hver gruppe fiskefartøjer under færøsk flag, er det antal, der blev udskrevet af landsstyret i 1993 til fiskefartøjer på 20 BRT eller mere.

Kapitel 8.
Statistik m.m.

§ 33. Landsstyret fastsætter regler om, at fiskefartøjer under færøsk flag, fiskekøbere og andre, der modtager fangst eller fiskeprodukter til lager, til omladning eller til at føre til opskibning udenlands, pålægges at indsende fangsttal, dagbøger, vægtsedler, oplysninger om salg og andre oplysninger om fiskeri til brug for statistiske og kontrolformål.

Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte regler om, at alle oplysninger, der kræves efter stk. 1, også skal indleveres, når udenlandske skibes fangster lægges op, bliver midlertidigt opbevaret eller omladet på Færøerne til videre transport.

Kapitel 9.
Fiskerikontrol

§ 34. Fiskerikontrollen er en landsinstitution med det formål at administrere regler om fiskerikontrollen i henhold til denne lov på havet og på land. Landsstyret fastsætter nærmere regler om fiskerikontrollen og om organisationen af denne, herunder regler om en observatørordning. Landsstyret kan bemyndige fiskerikontrollen at udføre de hjemler, landsstyret har i hen-

Stk. 2. Eftirlitið á sjónum við hesi lóg útinnir fiskiveiðieftirlitið á sjónum. Fiskiveiðieftirlitið á sjónum er samansett av skipum frá føroyska fiskiveiðieftirlitinum og flogførum og eftirlitsskipum frá donsku sjóverjuni. Samstarvið millum fiskiveiðieftirlitið og donsku sjóverjuna verður útint eftir samstarvsavtalu partanna millum.

Stk. 3. Tað áliggur fiskiveiðueftirlitinum at samskipa og gera avtalur við aðrar partar um at útinna allar fiskiveiðueftirlitsuppgávur eftir hesi lóg.

Stk. 4. Fiskiveiðueftirlitið hevur landsstýrisins vegna eftirlitið á landleiðunum við virksemi og viðurskiftum, sum kunnu ávirka møguleikarnar at reka fiskivinnu.

§ 35. Fiskiveiðueftirlitið ansar eftir, at reglurnar í hesi lóg og reglur ásettar við heimild í hesi lóg verða hildnar.

Stk. 2. Tað áliggur fiskiveiðueftirlitinum at hava eftirlit við øðrum uppgávum, sum landsstýrið leggur til fiskiveiðueftirlitið at fyrisita.

§ 36. Fiskiveiðueftirlitið á sjónum kann steðga fiskiførum og fiskaflutningsførum, fara um borð at gera tænastukanningar, herundir kanna skipsskjøl, manningarskjøl, skipsdagbøkur, kvotabøkur, lasta- og framleiðslubøkur og -uppgerð, reiðskap og veiðu og kann krevja, at reiðskapur og veiða verður tikin til nærri kanningar. Fiskifør kunnu eisini verða tikin inn í føroyska havn til nærri kanningar av reiðskapi og veiðu.

Stk. 2. Fiskiveiðueftirlitinum verður heimilað at ásetta bráðfeingis veiðubann fyri ávísar veiðuhættir á ávísum leiðum á landleiðunum, har íblandingin av ungfiski er meira enn ásetta hámarkið. Bráðfeingis veiðubann kann lýsast fyri upp til 2 vikur hvørja ferð. Fiskiveiðueftirlitinum verður somuleiðis heimilað at loyva einstøkum fiskiførum at gera royndir á bráðfeingis stongdari leið til tess at staðfesta, um bráðfeingis veiðubann skal verða ásett av

hold denne lov.

Stk. 2. Tilsynet til søs med denne lov udføres af fiskeriinspektionen. I fiskeriinspektionen indgår skibe fra den færøske fiskerikontrol samt fly og inspektionsskibe fra det danske forsvar. Samarbejdet mellem den færøske fiskerikontrol og det danske forsvar fastlægges i en samarbejdsaftale mellem parterne.

Stk. 3. Det påhviler fiskerikontrollen at koordinere og indgå aftaler med andre parter om udførelsen af alle fiskerikontrolopgaver i henhold til denne lov.

Stk. 4. Fiskerikontrollen udøver på landsstyrets vegne på fiskeriterritoriet tilsynet med virksomhed og forhold, der kan påvirke mulighederne for at drive fiskeri.

§ 35. Fiskerikontrollen tilser, at reglerne i denne lov og regler fastsat med hjemmel i denne lov overholdes.

Stk. 2. Det påhviler fiskerikontrollen at påtage sig andre opgaver, som landsstyret pålægger fiskerikontrollen at administrere.

§ 36. Fiskeriinspektionen kan standse fiskefartøjer og lastskibe, der fører fisk, gå ombord for at udføre tjenesteundersøgelser, herunder undersøge skibsdokumenter, bemandingsdokumenter, skibsdagbøger, kvotabøger, last- og produktionsbøger og -opgørelser, redskaber og fangst og kan kræve, at redskab og fangst bliver taget til nærmere undersøgelse. Fiskefartøjer kan også tages ind til færøsk havn til nærmere undersøgelse af redskaber og fangst.

Stk. 2. Fiskerikontrollen bemyndiges til at fastsætte midlertidigt fangstforbud som bestemte fangstmetoder på bestemte områder af fiskeriterritoriet, hvor ungfiskeandelen er højere end det fastsatte maksimum. Midlertidigt fangstforbud kan fastsættes for op til 2 uger ad gangen. Fiskerikontrollen bemyndiges ligeledes til at tillade enkelte fiskefartøjer at drive forsøgsfiskeri på midlertidig lukket område for at stadfæste, om midlertidigt fangst-

nýggjum. Bráðfeingis veiðubann verður lýst í Útvarpi Føroya.

§ 37. Landsstýrið kann áleggja fiskiførum at hava umborð eygleiðarar frá fiskiveiðueftirlitinum at gera kanningararbeiði í samband við fiskiveiðu við fiskiførum undir føroyskum flaggi á landleiðunum og uttan fyri landleiðirnar og fiskiførum undir fremmandum flaggi á føroysku landleiðunum. Útreiðslur til kost og uppihald ber fiskifarið. Eygleiðarar hava loyvi at nýta samskiftisútgerð fiskifarsins til tess at hava samband við myndugleikar á landi og við fiskiveiðueftirlitið.

§ 38. Fiskiveiðueftirlitið á sjónum kann krevja, at fiskifar verður verandi á eini knøttstøðu í ásetta tíð til tess, at kanningar kunnu fremjast. Knøttstøða og tíðarskeið skal so vítt gjørligt verða avtalað við skipara á avvarðandi fiskifari, tó soleiðis, at hetta ikki darvar fiskiskapinum óneyðugt.

§ 39. Landsstýrinum verður heimilað at áseta reglur um at forða fyri, at veiða, sum er fiskað í stríð við hesa lóg ella reglur ásettar samsvarandi hesi lóg, verða yvirførdar til onnur før ella avreidd, herundir um

1) skyldu at fráboða veiðunøgd
2) forboð móti at taka ímóti veiðu frá persónum ella fiskiførum og feløgum v.m., sum ikki hava veiðurættindi, og
3) forboð at taka ímóti veiðu, tá kvotan er uppfiskað.

§ 40. Fiskifør skulu á landleiðunum hava allan fiskireiðskapin burturstúvaðan innanborða á sínum náttúrliga staði, tá tey eru stødd á eini leið, har tað ikki er loyvt fiskifarinum at fiska. Tað sama er galdandi, tá fiskifarið liggur í havn.

forbud skal fastsættes på ny. Midlertidigt fangstforbud bekendtgøres i Færøernes radio.

§ 37. Landsstyret kan pålægge fiskefartøjer at have observatører fra fiskerikontrollen ombord til at udføre undersøgelser i forbindelse med fiskeri med fiskefartøjer under færøsk flag på fiskeriterritoriet og uden for fiskeriterritoriet og med fiskefartøjer under fremmed flag på det færøske fiskeriterritorium. Udgifter til kost og logi afholdes af fiskefartøjet. Observatører har, for at kunne have forbindelse med myndigheder på land og fiskerikontrollen, ret til at benytte fiskerfartøjets kommunikationsudstyr.

§ 38. Fiskeriinspektionen kan kræve, at et fiskefartøj befinder sig på en bestemt position i et angivet tidsrum i undersøgelsesøjemed. Position og tidsrum skal så vidt muligt være aftalt med vedkommende skibs fører således, at det ikke hindrer fiskeriet unødvendigt.

§ 39. Landsstyret bemyndiges til at fastsætte regler for at forhindre at fangst, der er fisket i strid med denne lov eller regler fastsat i henhold til denne lov, overføres eller afhændes til andre fartøjer, herunder regler om

1) pligt til at anmelde fangstmængde,
2) forbud mod at tage imod fangst fra personer eller fiskefartøjer og selskaber m.m., der ikke har fangstrettigheder, og
3) forbud mod at tage imod fangst, når kvoten er opfisket.

§ 40. Fiskefartøjer skal på fiskeriterritoriet have alle fangstredskaber bortstuvet ombord på rette plads, når de er på et område, hvor fiskefartøjet ikke har tilladelse til at fiske. Det samme er gældende, når fiskefartøjet ligger i havn.

Kapittul 10
Revsireglur v.m.

§ 41. Um ikki harðari revsing er ásett eftir aðrari lóg, verður tann revsaður við bót, ið:

1) brýtur reglur ásettar við heimild í § 9, stk. 1 og reglur ásettar við heimild í § 26 viðvíkjandi skipanini av fiskiskapinum,
2) brýtur reglurnar í § 10, stk. 1-6,
3) brýtur reglurnar í §§ 7 og 11, § 19, stk. 2, § 22, stk. 1, 1. punktum, § 25, stk. 2 og reglur ásettar við heimild í § 22 annars,
4) fylgir ikki treytum knýttar at loyvum latin eftir hesi lóg,
5) ger ikki eftir boðum ella forboðum givin sambært lógini ella reglum ásettar við heimild í lógini,
6) letur ósannar ella villleiðandi upplýsingar ella heldur aftur upplýsingum til nýtslu í prógførslu eftir lógini ella sum eru kravdar sambært lógini.

Stk. 2. Í kunngerðum gjørdar við heimild í lógini kann vera ásett revsing við bót fyri brot á reglur í hesum kunngerðum.

Stk. 3. Um brot verður framt av partafelag, smápartafelag, lutafelag ella líknandi, kann felagið sum slíkt verða revsað við bót.

§ 42. Sektarpeningur álagdur við heimild í hesi lóg fer í tann í § 18 nevnda grunn.

§ 43. Fyri inndrátt eru reglurnar í borgarligu revsilógini galdandi. Veiða ella virðið av veiðu kann tó verða inndrigið, hóast tað ikki er endaliga staðfest, at øll veiðan er fiskað ólógliga.

Stk. 2. Fyri brot á reglurnar um útblaking og brot á reglurnar um at veiða á stongdari leið verður veiða og reiðskapur altíð at draga inn.

Stk. 3. Mál, sum viðvíkja brotum á lógina ella reglum ásettar við heimild í lógini, kunnu verða avgjørd av løgregluni eins

Kapitel 10
Strafbestemmelser m.v.

§ 41. Medmindre højere straf er forskyldt efter anden lov, straffes med bøde den, der:

1) overtræder bestemmelser fastsat i henhold til § 9, stk. 1 og regler fastsat i henhold til § 26 vedrørende organisering af fiskeriet,
2) overtræder bestemmelserne i § 10, stk. 1-6,
3) overtræder bestemmelserne i §§ 7 og 11, § 19, stk. 2, § 22, stk. 1, 1. punktum, § 25, stk. 2 og bestemmelser i henhold til § 22,
4) ikke overholder betingelser i tilladelser givet i henhold til denne lov,
5) ikke følger påbud eller forbud givet i henhold til loven eller regler fastsat med hjemmel i loven,
6) giver usande eller vildledende oplysninger eller tilbageholder oplysninger til brug for bevisførelse ifølge loven eller som kræves ifølge loven.

Stk. 2. Der kan i bekendtgørelser udstedt med hjemmel i loven fastsættes bødestraf for overtrædelse af bestemmelser i disse.

Stk. 3. Er overtrædelse begået af aktieselskab, anpartsselskab, andelsselskab el.lign., straffes selskabet som sådant med bøde.

§ 42. Bøder pålagt med hjemmel i denne lov tilfalder den i § 18 nævnte fond.

§ 43. Vedrørende konfiskation er bestemmelserne i borgerlig straffelov gældende. Fangst eller værdi heraf kan dog inddrages, selv om det ikke er endeligt konstateret, at al fangsten er ulovlig.

Stk. 2. Overtrædes reglerne om forbud mod at kaste fangst over bord og udøves fiskeri på områder, der er lukket for fiskeri, kommer fangst og redskaber altid under konfiskation.

Stk. 3. Sager om overtrædelse af loven eller regler udstedt i henhold til loven, kan

væl og av skiparanum á avvarðandi fiskieftirlitsskipi, um bót, inndráttur og gjald av sakarmálskostnaði verða góðtikin.
Stk. 4. Verður málið ikki avgreitt eftir stk. 3, verður málið lagt fyri dómsvaldið. Upplýst eigur at verða um rættin til at leggja málið fyri dómsvaldið og hvør freistin er. Áheitan um at fáa málið lagt fyri dómsvaldið skal boðast fútanum frá í seinast lagi 1 viku eftir, at avgerðin er boðað viðkomandi.
Stk. 5. Viðvikjandi góðtøku eftir stk. 3 verður reglan í rættargangslógini um innihald í ákæruriti í løgreglumálum at nýta í hesum sambandi.

afgøres af såvel politiet som af føreren af vedkommende fiskeriinspektionsskib ved vedtagelse af bøde, konfiskation og sagsomkostninger.
Stk. 4. Afgøres sagen ikke i henhold til stk. 3, indbringes den for domstolene. Der bør oplyses om muligheden for, at forelægge sagen for domstolene og om fristen for forelæggelse. Begæring om forelæggelse for domstolene skal meddeles politimesteren senest 1 uge efter at afgørelsen er meddelt vedkommende.
Stk. 5. Med hensyn til den i stk. 3 nævnte vedtagelse finder bestemmelserne i retsplejeloven om anklageskrifts indhold i politisager tilsvarende anvendelse.

§ 44. Verður komið fram á ólógligan reiðskap í sjónum ella reiðskap, sum ikki er merktur sambært galdandi reglum, verður reiðskapurin inndrigin, um tað ikki kann verða greitt, hvør eigur hann. Sama er galdandi fyri reiðskap, ið er settur ella latin eftir á plássum, har fiskiskapur við hesum reiðskapi ikki er loyvdur, ella á plássum, har onnur hava einarætt til fiskiskap ella til ávíst slag av fiskiskapi.

§ 44. Findes der ulovligt redskab i søen eller redskab, der ikke er mærket i henhold til gældende regler, inddrages redskaberne, såfremt det ikke kan påvises, hvem det tilhører. Det samme er gældende for redskaber, der er sat eller forladt på steder, hvor fiskeri med disse redskaber ikke er tilladt, eller på steder, hvor andre har eneret til fiskeri eller til en vis form for fiskeri.

§ 45. Útlendsk skip, ið hava framt fiskiskap á føroyskum landleiðum undir slíkum umstøðum, at revsiábyrgd er staðfest eftir reglunum í § 41, kunnu haldast aftur av eftirlitsmyndugleikanum til falnar bótarupphæddir og sakarmálskostnaður eru goldin, ella til trygd er veitt fyri gjaldingini. Er ikki goldið 2 mánaðir aftaná, at málið er endaliga avgjørt, kann fulinaður verða tikin í skipinum.
Stk. 2. Um nevndu myndugleikar halda skip aftur, verða reglurnar í kapittul 72 í rættargangslógini um at leggja hald á lutir, ið tað verður hildið rætt at draga inn, at nýta samsvarandi. Afturhald kann bert fremjast, um tað er neyðugt fyri at tryggja, at nevndu upphæddir verða goldnar.

§ 45. Udenlandske skibe, der har fisket på færøsk fiskeriterritorium under sådanne omstændigheder, at strafansvar er indtrådt efter reglerne i § 41, kan tilbageholdes af kontrolmyndighederne til forfaldne bøder og sagsomkostninger er betalt, eller sikkerhed er stillet for betalingen. Sker dette ikke 2 måneder efter sagens endelige afgørelse, kan der søges fyldestgørelse i skibet.
Stk. 2. Såfremt et skib tilbageholdes af nævnte myndigheder, finder reglerne i kapitel 72 i retsplejeloven om beslaglæggelse af ting, der findes at burde inddrages, tilsvarende anvendelse. Beslaglæggelse kan kun foretages, såfremt det er nødvendigt for at sikre, at betaling finder sted.

§ 46. Fiskiveiðueftirlitið kann beinanvegin

§ 46. Fiskerikontrollen kan umiddelbart

taka inn veiði- og fiskiloyvi, um skiparin á fiskifarinum er skuldsettur fyri brot á reglurnar í § 9, nr. 8, § 10, stk. 4, § 19 og um ovurveiða á og uttanfyri føroysku landleiðirnar verður framd. Landsstýrið kann haraftrat mótrokna nøgdina av mettu veiðuni, sum blakað er út aftur, í egnari árskvotu ella felagsárskvotu.

Stk. 2. Landsstýrið kann taka aftur veiðiloyvið fyri ávíst tíðarskeið, um skiparin á fiskifarinum er dømdur ella hevur góðtikið bót fyri brot á hesa lóg ella reglur, ásettar við heimild í lógini. Fiskiveiðueftirlitið kann beinanvegin taka aftur veiðuloyvið, um brot verða staðfest á reglurnar um vernd av ungfiski, ásettar sambært § 9. Loyvið kann verða tikið aftur upp til 3 vikur hvørja ferð.

Stk. 3. Veiðiloyvishavarin kann krevja, at avgerðin eftir stk. 1 og 2 verður løgd fyri dómsvaldið. Avgerðin skal innihalda upplýsing um rættin til at leggja avgerðina fyri dómsvaldið og kærufreist. Áheitan skal fráboðast landsfútanum í seinasta lagi 1 viku eftir, at avgerðin er boðað viðkomandi. Málið verður lagt fyri dómsvaldið eftir reglunum í revsilógini § 78, stk. 3. Áheitanin frestar ikki tiknu avgerðina.

inddrage fangst- og fiskeritilladelse, såfremt føreren på fiskefartøjet er anklaget for overtrædelse af bestemmelserne i § 9, nr. 8, § 10, stk. 4, § 19 og for at have fisket mere end tilladt indenfor og udenfor færøsk fiskeriterritorium. Landsstyret kan yderligere modregne mængden af den anslåede fangst, der er kastet i havet, i individuel årskvote eller fælles årskvote.

Stk. 2. Landsstyret kan inddrage fangsttilladelsen for et bestemt tidsrum, såfremt fiskefartøjets fører er dømt eller har vedtaget bøde for overtrædelse af bestemmelserne i denne lov eller regler, fastsat med hjemmel i loven. Fiskerikontrollen kan umiddelbart inddrage fangsttilladelsen, såfremt der konstateres overtrædelse af reglerne om værn af ungfisk ifølge § 9. Tilladelsen kan inddrages for op til 3 uger ad gangen.

Stk. 3. Indehaveren af fangsttilladelsen kan kræve, at afgørelsen efter stk. 1 og 2 forelægges domstolene. Afgørelsen skal indeholde oplysning om retten til at indbringe afgørelsen for domstolene og ankefrist. Henvendelsen skal meddeles landfogeden inden 1 uge efter, at vedkommende har fået meddelelse om afgørelsen. Sagen indbringes for domstolene efter reglerne i straffelovens § 78, stk. 3. Indbringelsen har ikke opsættende virkning.

§ 47. Brot á reglur ásettar við heimild í hesi lóg ella reglur um útinnan av embætisskyldu kunnu hava við sær, at landsstýrið kann taka aftur rættindi eftir hesi lóg endaliga ella fyribils.

Stk. 2. Tílíkar avgerðir kunnu innan 2 vikur skjótast inn fyri Føroya Rætt. Hetta frestar ikki tiknu avgerðirnar.

§ 47. Overtrædelse af regler fastsat med hjemmel i denne lov eller regler om udførelse af embedspligt kan medføre, at landsstyret inddrager rettigheder efter denne lov endeligt eller midlertidigt.

Stk. 2. Sådanne afgørelser kan inden 2 uger indbringes for Færøernes Ret. Indbringelsen har ikke opsættende virkning.

§ 48. Brot á reglur fyri fiskiskapi við heimild í hesi lóg, ella brot á treytir í loyvum, kunnu hava við sær avmarkingar í rættinum at nýta givin loyvi og kvotur. Grov brot og endurtøka av brotum kunnu hava við sær, at givin rættindi verða tikin aftur. Slíkar avgerðir verða tiknar av

§ 48. Overtrædelse af regler for fiskeri med hjemmel i denne lov, eller overtrædelser af betingelser i tilladelser, kan medføre begrænsninger i retten til at gøre brug af tilladelser og kvoter. Grove overtrædelser og gentagelser kan medføre, at givne rettigheder inddrages. Sådanne

landsstýrinum og kunnu áðrenn 2 vikur frá kunngerðardegi leggjast fyri Føroya Rætt.

§ 49. Føroya Landsstýri kann áseta reglur um, at avgerðir um at taka aftur veiðu- og fiskiloyvi, sum tiknar eru sambært § 46, ikki kunnu kærast til landsstýrið.

§ 50. Henda lóg fær gildi 1. januar 1994. Samstundis fara úr gildi løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978 um fiskiveiði á landleiðini, løgtingslóg nr. 77 frá 12. juni 1990 um fiskiveiðu á innaru landleiðini og í áum, løkum og vøtnum, løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond og løgtingslóg nr. 55 frá 22. september 1978 um regulering av føroyskum fiskiskapi uttan fyri landleiðina.
Stk. 2. Kunngerðir, sum eru settar í gildi við heimild í teimum lógum, sum fara úr gildi, hava framvegis gildi í tann mun tær ikki stríða ímóti ásetingunum eftir hesi lóg.

afgørelser tages af landsstyret og kan inden 2 uger fra bekendtgørelsesdagen indbringes for Færøernes Ret.

§ 49. Færøernes Landsstyre kan fastsætte bestemmelser om, at afgørelser om at inddrage fangst- og fiskeritilladelser i henhold til § 46, ikke kan indbringes for landsstyret.

§ 50. Denne lov træder i kraft 1. januar 1994. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 8 af 29. marts 1978 om fiskeri på fiskeriterritoriet, lagtingslov nr. 77 af 12. juni 1990 om fiskeri på det indre fiskeriterritorium og i ferske vande, lagtingslov nr. 9 af 29. marts 1978 om fiskeriaftaler med fremmede lande og lagtingslov nr. 55 af 22. september 1978 regulering af færøsk fiskeri udenfor fiskeriterritoriet.
Stk. 2. Bekendtgørelser, givet med hjemmel i de love, der ophæves, har fremdeles gyldighed i det omfang de ikke er strid med bestemmelserne i denne lov.

Viðmerkingar:

Tá fiskimarkið fyrst í 1977 fór frá 12 út á 200 fjórðingar tóku føroyskir myndugleikar við ábyrgdini av einum stórum havøki - til støddar sum helvtin av Norðsjónum - við ríkum fiskigrunnum. Áðrenn útflytingina vóru tað reglurnar hjá Fiskivinnunevndini fyri landnyrðingspartin av Norðuratlantshavi, NEAFC, sum høvdu gildi fyri fiskiskapin uttan fyri 12 fjórðingar. Hetta vóru tær reglur, sum limalondini í NEAFC kundu semjast um, og vóru tær ikki umfatandi.

Tær heimildarlógir, sum heimastýrið í 1978 útvegaði sær til at skipa fyri fiskiskapinum í hesum nýggja parti av Føroyum, bendu tó lítið á, at umstøðurnar vóru broyttar. Amboðini vóru tey somu, sum NEAFC hevði nýtt, og lítið orðaskifti var um setningin fyri, hvussu hetta náttúrutilfeingið skuldi røkjast. Hesin vantandi setningurin vísir seg bæði í heimildarlógunum fyri stýring av fiskiskapinum og í skattalógum, studningslógum, lógunum um endurnýgging av fiskiskipaflotanum, stuðul til fiskavirki og í tí umsitingarligu siðvenju, sum varð bygd á hesar lógir. Vantandi setningurin fyri fiskivinnupolitikkinum er meginorsøkin til, at fiskivinnan á føroysku landleiðunum er komin í ta truplu støðuna, sum hon nú er í, við ov nógvari veiðiorku, ov nógvari virkisorku á landi, niðurfiskaðum fiskastovnum og stórum rakstrarligum halli bæði á sjógvi og landi.

Bygnaðarnevndin, sum lat frágreiðing sína úr hondum 1. juli 1993, hevur greitt frá søguligu gongdini og víst á avleiðingarnar av, at heimildir ikki hava verið at skipa so fyri, at náttúrutilfeingið verður røkt burðardygt og skilagott, so at fiskivinnan kann virka undir vanligum marknaðarbúskapi og geva eitt

positivt íkast til føroyska búskapin. Løgtingið viðgjørdi 7. september 1993 frágreiðingina hjá Bygnaðarnevndini og verða her ávís grundsjónarmið hjá nevndini endurgivin:

"Nevndin heldur, at umfram regulmar fyri tal á veiðiloyvum og tekniskar regularingar er tørvur á reglum fyri at tryggja, at veiðan úr hvørjum fiskastovni sær ikki fer upp um tað, sum stovnarnir lívfrøðiliga tola.

Fyrsta kravið er, at ikki verður veitt meira enn stovnarnir tola á varandi, burðardyggum grundarlag.

Ein reguluskipan eigur eisini at uppfylla rakstrar- og samfelagsbúskaparlig krøv. Rakstrarbúskaparliga kravið er, at raksturin per seg og kann gjalda bæði skiftandi, fastar og fíggjarkostnað. Samfelagsbúskaparliga kravið er, at veiðan gevur so stórt íkast til nettotjóðarúrtøkuna, sum gjørligt. Eisini skal skipanin tryggja, at gott arbeiði og góðska gevur fíggjarligt úrslit og at meira verður hugsað um trygga langtíðargongd enn løtuvinning.

Tað hevur stóran týdning, at vinnan kennir treytir og karmar eitt rímiligt tíðarskeið framyvir. Tí eiga reglurnar ikki lættliga at kunna broytast og mest loyvda veiði (TAC) eigur at verða ásett fyri so mikið langt tíðarskeið, at vinnan fær lagt atlanir. Bert klár tekin í náttúruni um, at støðan er yvir ella undir miðal, skulu føra til, at broytingar verða gjørdar í mest loyvdu veiðuni fyri hvørt fiskaslag í einum skeiði.

Skipanin skal vera greið og lætt og einfald at umsita. Eftirlitið má ikki vera ov kostnaðarmikið og skal tryggja, at skipanin verður nildin. Tað hevur størsta týdning, at vinnan góðtekur skipanina og at skipanin stendur á tryggari lógargrund.

Tess meira beinleiðis verður latið til reinar búskaparligar avgerðir, tess meira tykist stórfelags-(koncern)rakstur at vinna frama. Tað er, at vinnulívið verður savnað í stór feløg, við sterkari miðsavnandi leiðslu. Talan verður ofta um lodrætta - vertikala - samanlegging og ætlanarlegging og menning verður flutt til miðleiðsluna.

Mótt hesum stendur ein annar háttur at menna vinnulívið, har bygt verður á sjálvstøðugar virkiseindir, sum bæði kunna samstarva og kappast, so at øll lið verða rikin so oygt sum gjørligt. Hetta verður ofta kalla vatnrætt - horisontalt - samstarv mótvegis vertikalum.

Við tí greiða setningi í huga, sum nevndin hevur fingið, um at loysnir skulu vera við atliti til at gagnnýta náttúrutilfeingið optimalt og burðardygt undir marknaðarbúskapartreytum, er nevndin á einum máli um at skjóta upp, at gjørd verður ein skipan við egnum handilskvotum, roknaðar út frá mest loyvdum veiðimøgdum (TAC) fyri stovnarnar, sum verða ásett fyri 5 ár í senn.

Fyrsta 5 ára skeiðið til 1998 verða kvoturnar fyri torsk og hýsu settar við tí fyri eyga at byggja upp stovnarnar, fyri upsa við tí fyri eyga at fáa minka líðandi um veiðitrýstið fram til 1998 og fyri aðrar stovnar eftir miðalveiðini 1988 -1992. Mest loyvda veiðan fyri næsta 5 ára skeiðið verður fyri torsk, hýsu og upsa bygd á nvussu væl ætlanin hevur heppnast.

Tann nøgd, ið verður loyvd at veiða hvørt árið, tá stovnarnir eru mentir aftur, verður grundað á miðaltal. Náttúrligar broytingar í tilgongdini kunnu við tílíkari skipan gera, at veiðan upp á veiðiorku kann vera rættuliga skiftandi. Fyrimunurin við tílíkari skipan er, at vinnan yvir fleiri ár veit nvussu nógv er til taks. Tað er tí avgerandi at nildið verður fast um 5 ára mest loyvdu veiðina sjálvt um veiðitílíkindi broytast. Bert um kanningar sýna at stórar broytingar eru í lívfrøðiligu fortreytunum kann tað koma upp á tat at hækka ella lækka støðið. Ein føst mannagongd eigur at verða skipað til at áseta 5 ára mest loyvdu veiðina og til at meta um týdningarmiklar broytingar eru í lívfrøðiligu fortreytunum.

Fiskiskapur í altjóða sjógvi og fiskiskapur eftir ávísum ikki-fullnýttum, alternativum fiskasløgum kemur ikki undir skipanina við egnum handilskvotum. Hetta skuldi eggjað skipum til royna eftir alternativum fiskasløgum fyri at fáa inntøkur aftrat teimum frá egnum handilskvoturum.
Kvotur og loyvdar veiðimøgdir eru veikent amboð í føroyskari fiskivinnuumsiting í fiskivinnuavtalum í altjóða kommissiónum og við onnur lond. Ein partur av feskfiskaflotanum er longu undir báta-kvotuskipan undir Íslandi.

Roknað verður við, at teir einstøku skipabólkarnir verðveita sín søguliga part av veiðini av teimum einstøku fiskasløgunum. Tað sæst at veiðan av summum fiskasløgum er so avmarkað, at hesi sløg fyri hvørjan bólk eiga at fara upp í egna tjáveiðikvotu.

Skipanin, ið her er skotin upp, kemur sostatt aftursat og kann møguliga koma í staðin fyri tær reguluskipanir, sum hava verið í gildi fram til 1992. Skipanin fer at avmarka frælsið til fritt at avgera, hvørjum fiskaslag roynt verður eftir, men fer at geva rúmari rasur fyri at leggja til rættis hvussu mest fast burturúr veiðimøguleikunum fíggjarliga.

Ein stórur fyrimunur við hesi skipan er, at politisku myndugleikarnir fara frá smálutastýring og til at seta karmar. Innan fyri tann karm, sum lívfrøðiligu fortreytirnar seta, verður vinnan sjálv at finna fram til hvør samansseting av fiskiflotanum, ið roynist/hóskar best.

Tað er nevndini greitt, at hetta uppskot - eins og allar skipanir, sum avmarka virksemið - hevur bæði fyrimunir og vansar. Ein vansi, ið serliga er at nevna, er møguleikin fyri at blaka fisk fyri borð, tá ið kvotan er rokkin eitt um stórur prismunur er á ymiskum fiskastøddum. Nevndin heldur, at tað eigur ikki at vera loyvt at blaka fisk fyri borð, men at hesin trupulleiki er minni, tá ið kvoturnar eru egnar, enn tá tær eru bólkakvotur.

Dygt eftirlit við veiðimøgdum kann vera ein av vansunum. Sigast kann, at vit fáa eitt annað slag av eftirliti enn tey, vit hava havt t.d. við meskaviddum og stongdum leiðum. Við rímiligum veiðimøgdum knýttar at hvørjum veiðiloyvi, t.e. at rímiligir møguleikar eru fyrt, at vinnan hongur saman búskaparliga, heldur nevndin, at tað fer at bera til at skipa eitt dygt eftirlit.

Nevndini er tó greitt, at bráðfeingis búskaparligar broytingar kunnu føra til bráðfeingis broytingar í fiskiflotanum, sum ikki eru ynskiligar. Tað er eyðvitað eitt, sum forðar fyri at seta mark fyri, hvussu fritt kvoturnar kunnu seljast, men neyðugt er at vera varin við at seta mark, ið virka moti tí búskaparliga vinningi, sum skipanin í sini heild kann geva.

Nevndin heldur, at teir størstu trupulleikarnar fara at vera í fyrstani. Serliga er at nevna, at tey fistiføri, sum royna eftir toski og hýsu, hava truoulleikar av teimum sera strongu kvotunum, ið eru settar fyri hesi fiskasløg í uppbyggingarskeiðnum.

Tá ið tikið verður samanum metir nevndin, at við rímiligum tali á fiskiloyvum innan fyri hvønn skipabólk sær, teknískum tiltøkum og partil einari skipan við ognum handilskvotum fer fiskiflotin at kunna laga seg eftir teimum marknaðarbúskaparligu umstøðunum.

Sygraðarnevndin hevur ikki tikið støðu til spurningin um ognarrættin til fiskirikidømi undir Føroyum. Tá skipanin við veiðiloyvum varð sett í gildi í 1987, staðfesti hetta rættin hjá summum at fáa skip og rættin til at veiða á føroyska landgrunninum. Ein skipan við eirgivnum handilskvotum knýtir veiðimøgdir upp í hendar rætt.

Skipanin hevur við sær, at bert bátar/fiskimenn við veiðuloyvi/kvotu, kunna avreiða, og hetta fer at broyta røttindini hjá føroyingum at avreiða verði (sum oftast tosk og hýsu, men eisini nakað av upsa) av egnum báti. Um hesi røttindi skulu varðveitast, mælir nevndin til, at ávís kvota verður sett av til hesar bátar, grundað á søguligt tal, og at møgdirnar verða antin:

Seldar á uppboði sum nógvar smáar kvotur, sum landsstýrið skipar fyri, ella

Verður skipað sum heildarkvota fyri allar hesar bátar, soleiðis at ikki er loyvt at avreiða, tá kvotan er uppi.

Ymisk veiða á landgrunninum kemur ikki undir kvotuskipanina, men verður skipað við serligum fiskiloyvi. Hesar eru trolveiða eftir flatfiski, ídnaðartroling eftir hvítingsbróðuri, svartkjafti og gulllaksi, garnaveiða eftir havtasku og svartkalva, laksaveiða, skeljaveiða og humaraveiða.

Tað er ein treyt í serdaliga tilmælinum, at avreiðingarprisurin verður funnin í friari kapping millum fiskakeyparar. Vertikal samskipan millum fiskavirki og skip kann forða fyri hesum. Talið á keyparum í Føroyum er avmarkað, og tí kann vandi vera fyri, at prísirnir ikki verða ásettir frítt. Avreiðingarprísurin eigur tí at verða tengdur at europeiska marknaðinum, soleiðis at fiskur kann verða seldur uttanlands, um ikki nóg góður prísur fæst í Føroyum. Tað er umráðandi, at tann frie priskappingin fører við sær, at betri prísur fæst fyri góðan fisk, og at veiðitíðin verður lagað marknaðinum. Eru føroysk fiskavirki før fyri at kappast við europeiska megarlandið um føroyska fiskin eru tey eisini før fyri at keypast ur fisk hjá útlendskum skipum, sum sigla framvið Føroyum.

Greiðar reglur fyri støddar- og góðskubýti og møguleiki fyri at keypa fisk í smærri nøgdum, gevur størri møguleika fyri serframleiðslum og geva harvið eisini grundarlag fyri hægri rafiskaprísum."

Egnar handilskvotur eru royndar í fleiri londum. Serliga er at nevna næsta grannaland okkara fyri norðan, Ísland. Tó er at siga, at skipanin har ikki hevur verið roynd í fullum líki og sum einasta skipan enn. Skipanin er síðani 1983 vorðin víðkað so við og við til at umfata størri og størri partar av feskfiskaveiðuni og frá 1991 hava bert smærri útróðrarbátar undir 10 tons í ávíst mát verið uttan fyri skipanina. Allar avleiðingarnar eru tí ikki komnar fram enn, men niðurstøðan tykist vera, at búskaparligu úrslitini hjá fiskiførunum eru batnað, hóast fiskastovnarnir av náttúruávum eru minkaðir síðani 1983. Eisini hevur tann avleiðing verið, at fiskurin nú verður seldur teimum virkjum, sum klára at bjóða mest. Tað er eyðsæð, at tílíkar skipanir føra broytingar við sær og við tí eisini avleiðingar fyri ávísar partar av fiskivinnuni, og kunnu føra til atfinningar móti skipanini. Royndirnar í øðrum londum, Kanada, New Zealandi og Alaska vísa, at sama skipan hóskar alla staðni. Neyðugt er at laga skipanina við egnum kvotum til tær serligu umstøðurnar, sum eru á staðnum.

At býta út konsessiónsrættindir og veiðiloyvir í hesi skipan við handilskvotum, verður ikki gjørt fyri tey, sum fáa konsessiónir og veiðiloyvi, men við tí endamáli at verja fiskastovnar og eina trygga fiskivinnu við ikki at loyva, at veiðan úr hvørjum fiskastovni sær fer upp um tað, sum stovnarnar lívfrøðiliga tola. Av tí, at endamálið er at verja felags samfelagsognina og náttúrutilfeingið í havinum um Føroyar, verður tað ein skylda hjá teimum, sum fáa nýtslurættindi, at nýta hesi rættindi í tráð við endamálið. Tað er ikki bert uppgávan hjá fiskiveiðumyndugleikunum at verja fiskastovnarnar. Rættinda- og loyvishavarar hava somu uppgávu og mugu tí, um tey við vilja bróta reglurnar í skipanini, missa síni veiðirættindi.

Hetta uppskot til løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap byggir á niðurstøðurnar hjá Bygnaðarnevndini. Tað avloysir 4 løgtingslógir um fiskiveiði, nr. 8 frá 29. mars 1978 um føroyska veiði á ytru landleiðini, nr. 77 frá 12. juni 1990 um føroyska veiðu á innaru landleiðini, nr. 9 frá 29. mars 1978 um útlendska veiðu á føroysku landleiðini og nr. 55 frá 22. september 1978 um føroyska veiðu uttan fyri landleiðina. Sostatt umfatar hon veiðu hjá føroyskum skipum á føroysku landleiðunum og uttan fyri landleiðirnar og hjá fremmandum skipum á føroysku landleiðunum.

Lógin er bygd upp soleiðis, at skilt verður greitt millum útinnandi valdið hjá landsstýrinum og lóggevandi valdið hjá løgtinginum. Løgtingið setur karmar í lógarformi, sum heimila landsstýrinum at gera tey neyðugu tiltøkini og taka tær einstaku umsitingaravgerðirnar, so at endamálini við hesi lóg verða rokkin. Við hesum verður politiska ábyrgdin av umsitingini av lógini greitt løgd fast.

Skipanin, sum skotin verður upp, umfatar allar bólkar av fiskiførum. Møguleikin at umseta kvotur hevur hesar avmarkingar: Skip omanfyri 110 tons kunnu ikki leiga ella keypa kvotur hjá útróðrarbátum, men útróðrarbátar kunnu leiga og keypa frá støtri fiskiførum. Fyri útróðrarflotan yvir 20 BRT kunnu ognarar av fiskiførum velja, um teir vilja fiska undir felagskvotu ella egnari kvotu. Fyri útróðrarbátar undir 20 BRT er bert møguleiki at fiska undir felagskvotu. Eigarum av hesum bátum er tó loyvt at keypa sær eguar kvotur og at veiða hesar.

Skipanin er ein eindarskipan fyri fiskiskap á føroysku landleiðunum og uttan fyri føroysku landleiðirnar. Tað verður bert møguligt at fáa kvoturættindi hjá teimum, sum eiga fiskifør, ið høvdu veiðiloyvi í 1993.

Broytingarnar í bygnaðinum í fiskivinnuni á landi hava við sær, at tøttu bondini millum skip og virki nú verða brotin. Samstundis hevur landsstýrið lagt fyri tingið broytingar í lógini um fløgustuðul, sum bøta um møguleikarnar hjá fiskiførum at selja uttan fyri Føroyar, um fiskavirkir í Føroyum ikki klára at bjóða rímiligan prís fyri rálisk. Samantikið skuldi hetta gjørt, at trýst verður á fiskavirkini at virka fisk á ein hátt, sum ger tað møguligt at bjóða teimum, sum hava kvoturættindi, ein rímiligan prís.

Hugsað hevur verið um avmarkingar av øðrum slag, millum annað avmarkingar í rættinum at selja kvotur úr einari sýslu í aðra. Landsstýrið hevur mett, at hetta ikki er neyðugt við teimum broytingum, sum nú eru í fiskavirkingini á landi. Virkini verða løgd um til serframleiðslur og týdningurin av at ráða yvir veiðiloyvum og kvotum til at tryggja ávísum virki rávøru skuldi tí minka. Hinvegin er greitt, at tað kann hava týdning fyri virksemið um landið, at fiskifør eru knýtt at ávísum plássum. Skotið verður tí upp, at persónar og feløg í

eini sýslu fáa forkeypsrætt at bjóða upp á fiskifør við veiðiloyvi úr hesari sýslu, um søla fer fram.

Skotið verður upp, at ásetta heildarkvotur fyri 7 fiskastovnar á føroysku landleiðunum: Toskur á landgrunninum, toskur á Føroya Banka, hýsa, upsi, kongafiskur, blálonga, longa og brosma.
Fyri fiskiskap uttan fyri føroysku landleiðirnar eru kvoturnar tær, sum koma frá sínámillum fiskiveiðiavtalum og teimum altjóðalciðum, sum løgtingið hevur góðkent avtalur um.

Fyri teir 7 stovnarnar undir Føroyum verða kvoturættindi roknað út fyri 4 bólkar av fiskiførum. Stáltrolarar yvir 400 HK, stállínuskip yvir 110 BRT, útróðrarbátar yvir 20 BRT, og útróðrarbátar undir 20 BRT. Parturin hjá bólkinum verður roknaður út eftir veiðitølunum frá 1977, tá fiskimarkið fór út, til 1992. Tað verður hildið at vera rætt at áseta bólkakvoturnar út frá veiði alt tíðarskeiðið 1977 - 1992 fyri at árinið frá studningspolitikkinum og stuðli til bygging av fiskiskipum ikki skal aviaga søguliga grundarlagið.

Býtið millum einstøk fiskifør innan bólkar verður roknað út frá miðaltølum fyri 4 tey bestu árini av árunum frá 1986 til 1992.
Summir stovnar, sum verða mettir at vera fult gagnnýttir sum er, koma ikki undir kvotaskipan, men undir skipan við serligum fiskiloyvum til eitt avmarkað tal av fiskiførum. Talan er um flatfiskastovnar, svartkalva- og havtaskuveiða við gørnum, laksa-, skelja og hummaraveiða.

Gingið verður út frá, at galdandi reglur viðvíkjandi reiðskapi og ungfiskaverju halda áfram, og at stongdar leiðir verða umskipaðar, so at leiðirnar innan fyri 12 fjórðingar, Føroya Banki, og 4 leiðir (kassar) ávikavist norðan, sunnan, eystan og vestan fyri oyggjarnar verða stongdir fyri troli. Eisini verður kalvakassin vestanfyri og friðingarnar í gýtingartíðini varðveittar.

Til at stuðla landsstýrinum í hesum og seta fram uppskot um, hvussu endamálini best vera rokkin, verður skotið upp, at landsstýrið kann seta niður eina nevnd, har virkandi fiski- og útróðrarmenn eru umboðaðir saman við serfrøðingum innan fiskifrøði og fiskivinnubúskaparfrøði.

Skotið verður upp, at teir persónar og tey felløg, sum fáa kvoturættindi, varðveita hesi í 20 ár. Møguleiki er eftir umsókn at fáa longt rættindini út um tey 20 árini. Hugsanin er, at kvoturættindi ikki verða veitt sum ogn, men heldur sum ein tíðaravmarkað konsessión, sum kann takast aftur ella ganga út. Hin vegin er neyðugt at hava eina skipan, sum loyvir vinnuni at gera langtíðarætlanir, tí galda kvoturættindini í minsta lagi 20 ár.

Umsitingin av hesi lóg verður ikki mett at kosta meira enn umsitingin av galdandi lógum. Við umleggingum og broyttum arbeiðsgongdum kann umsitingin haldast innan fyri galdandi fíggjarkarmar. Av týdningi er eisini, at reglurnar, sum verða ásettar sambært hesi lóg, verða skrivaðar so einfalt sum gjørligt, so tær eru einfaldar at umsita. Av tí at eftirlitsspurningurin er av størsta týdningi, fer landsstýrið at samskipa alt fiskiveiðieftirlit undir ein stovn fyri at tryggja eitt dygt og gott eftirlit. Dentur fer at vera lagdur á egineftirlit, sum verður kannað við stakroyndum av fiskiveiðieftirlitinum. Í revsireglunum verður skotið upp at fara serliga hardliga fram, um fiskifør blaka fisk út aftur.

Møguligt verður at mótrokna kvotu, um veitt verður út um kvotur og veiða verður blakað fyri borð aftur. Fiskiloyvi kann verða tikið aftur fyri brot á ungfiskareglurnar, fyri grova ovfisking og fyri at blaka veiðu fyri borð aftur.

Fútin hevur boðað frá, at ikki er møguligt í løgtingslóg at yvirføra løgreglumyndugleika til føroyskar myndugleikar. Hetta verður nú kannað saman við donskum myndugleikum. Revsireglurnar verða í løtuni kannaðar saman við fútaembætinum, og verður tí helst neyðugt at fremja broytingar í ordingini.

Lógin er býtt upp í 10 kapittul:

Kapittul 1.	Lógarøki, endamál og allýsingar
Kapittul 2.	Almennar reglur fyri fiskiskapi
Kapittul 3.	Reglur um kvoturættindi
Kapittul 4.	Ásetan av veiðirættindum á føroysku landleiðunum hjá teimum, sum eiga fiskifar undir føroyskum flaggi
Kapittul 5.	Veiða á føroysku landleiðunum við fiskiførum, sum eru undir fremmandum flaggi.
Kapittul 6.	Veiðirættindi uttan fyri føroysku landleiðirnar hjá teimum, sum eiga fiskifar, sum eru undir føroyskum flaggi, uttan fyri føroysku landleiðirnar.
Kapittul 7.	Skiftisreglur og ymsar ásetingar
Kapittul 8.	Hagtøl
Kapittul 9.	Fiskiveiðiftirlitið
Kapittul 10.	Revsireglur v.m.

Viðmerkingar til einstøku greinirnar:

ad § 1.
Við nýggju lógini verður skapaður ein heildar lógarkarmur fyri vinnuligt virksemi á sjónum, ið gagnnýtir tað livandi tilfeingið, sum er til taks hjá føroysku tjóðini. Undantikin eru bert dýrasløg, sum eru undir serligari löggávu.

ad § 2.

Stk. 1. Grundarlagið undir reglunum í lóggávuni er, at livandi tilfeingið í 1977 varð ogn hjá føroysku tjóðini. Dentur verður síðani lagdur á, at uýtslurætturin til hesa ogn verður skipaður eftir tí náttúran tolir, so komandi ættarlið í Føroyum eisini kunna liva av sjónum. Lógin byggir á javnvág og samspæl millum lívfrøðilig og búskaparlig sjónarmið, til tess at tryggja, at vinnuligi fiskiskapurin kann geva eitt trygt búskaparligt íkast til føroyska samfelagið og møgulcikar fyri arbeiði og inntøku kring landið.

Stk. 2. Samstarv okkara úteftir viðvíkjandi stovnum, sum bæði liva í føroyskum og útlendskum/altjóða sjógvi ella bert í útlendskum/ altjóða sjógvi, eigur at byggja á somu grundsjónarmið, sum nevnd í stk. 1.

Stk. 3. Til at røkka endamálum í lógini, er neyðugt við samstarvi og undirtøku frá vinnuni, og kann landsstýrið tí útvega sær ráð og vegleiðing frá sakkønari nevnd, mannað við

umboðum frá vinnuni, útróðrar- og fiskimonnum og serfrøðingum viðvíkjandi lívfrøði og búskapi innan fiskivinnuna.

ad § 3.

Lógin er ein heildarkarmur um alt virksemi knýtt at fiskiveiði undir føroyskum flaggi og alt virksemi knýtt at fiskiveiði á føroysku landleiðunum.

Stk. 2. Rættindi fingin í veiðu- og fiskiloyvi og tillutan av kvotum gevur ikki einstaklingum ella samtøkum av einstaklingum ein ognarrætt í vanligum týdningi. Rættindi latin við heimild í hesi lóg eru brúksrættindi til partar av tilfeinginum, og greiðar skipanir og reglur fyri hvussu hesin rættur kann nýtast, bæði í tíð og í háti.

ad § 4.

Stk. 1 - 3. Hesar ásetingar eru tær somu sum í núgaldandi lóggávu.

Stk. 4. Lýsing av økjunum uttanfyri føroysku landleiðirnar hava ikki fyrr verið greind út í lóggávuni. Lógin fevnir somuleiðis um allar havleiðir uttan fyri Føroyar og reguleringar av føroyskari fiskiveiðu á øllum slíkum leiðum samsvarandi sínámillum fiskiveiðiavtalum og altjóða avtalum, sum løgtingið hevur góðkent.

ad § 5.

Greinin lýsir hugtøk og skipanaramboð, ið verða nýtt at røkka endamálunum í lógini. Summi verða longu nýtt í føroyskari lóggávu, men størsti parturin eru nýggj fyribrigdi við neyvum sambandi við nýggju skipanina um kvotur.

Stk. 1. MLV, mest loyvda veiðan, verður lívfrøðiliga, vísindaliga grundarlagið undir heildarkvotuni, sum lýst í stk. 2. Hetta er tað sama sum útlendska styttingin TAC.

Stk. 2. Heildarkvota í einum fiskiári til skip undir føroyskum flaggi er tað tonsatal av fiski, hvørjum fiskastovni sær, ið landsstýrið, bygd á tilmæli um MLV, ásetur, minkað við tí nøgdini, ið fremmand skip, sambært avtalu, fiska í føroyskum sjógvi. Um veiðan hjá útlendskum skipum ikki broytist, og landsstýrið ikki (sí § 23) broytir hægsta mark fyri veiðuni, ið hann smb. § 23 ásetir fyri 5 ár, so er heildarkvotan óbroytt í 5-ára skeiðnum. Hetta at áseta heildarkvotuna fyri 5 ár verður hildið at hava stóran týdning fyri møguleikunum hjá vinnuni at leggja ætlanir, sammett við eina skipan, har óvissa er um heildarkvotuna ár um ár. Heildarkvotur uttan fyri føroysku landleiðirnar kunnu vanliga bert vera 1 ár í senn, tí sínámillum avtalurnar bert verða gjørdar fyri eitt ár í senn.

Stk. 3. Veiðuloyvi er knýtt at fiskifarinum, og er almenna góðkenningin av, at ávíst fiskifar kann veiða innan og uttan fyri føroysku landleiðirnar.

Stk. 4. Fiskiloyvi vísir veiðirættindini í einum fiskiári hjá ávísum skipacigara og hvørjum fiskifari hann kann veiða við. Fiskiloyvi kunnu broytast til ávísar frestir í árinum. Kvotur kunnu keypast, seljast ella leigast 3 ferðir um árið til tær ymisku fiskitíðirnar í árinum (vár-, summar- og heystróður.)

Stk. 5. Felags kvotuparturin er søguligi rætturin, ávísur bólkur av fiskiførum hevur vunnið sær. Hann sigur, hvussu stóran prosentpart bólkúr hevur í ávísum fiskastovni. Hann er óbroyttur ár undan ári og verður nýttur til at rokna út felags árskvotuna.
Felags árskvota er felags kvotupartur umroknaður til tons í hvørjum fiskastovni og kann tí broytast um heildarkvotan broytist.

Stk. 6. Egin kvotupartur er søguligi rætturin, sum ognari av fiskifari hevur vunnið við ávísum fiskifari. Hann sigur, hvussu stóran prosentpart ávísur rættindahavari hevur í ávísum fiskastovni. Hann er óbroyttur tey 20 árini konsessiónin gongur og verður nýttur til at rokna út egnu árskvotuna.
Egin árskvota er egin kvotupartur umroknaður til tons í hvørjum fiskastovni og kann tí broytast, um heildarkvotan broytist.

Stk. 7. Hjáveiðukvota. Ætlanin er at taka tey fiskasløg, sum eru minni enn 5 % av egnum ella felags kvotuparti hjá teimum ymsu bólkunum av fiskiførum saman í hjáveiðikvotu, sum verður ásett sum ávíst % av høvuðsveiðuni. Hjáveiðiprosentið kann broytast ár um ár, tí javnvágin millum ymisk fiskasløg kann broytast og tað ikki má gerast ómøguligt at fiska høvuðsfiskasløgini vegna avmarking í hjáveiði.
Lýsini verður tað hildið, at eftirlitið verður ov trupult, um skil skal haldast á fáum tonsum burtur úr fleiri fiskastovnum fyri hvørt fiskifar, sum hevur egnan kvotupart. Skilt verður millum hjáveiði av fiskasløgum undir heildarkvotu og fiskasløg, har eingin heildarkvota er ásett.

ad § 6.

Reglan er ætlað at tryggja, at aldargamli rætturin at søkja sjógvin til egnu nýtslu ikki verður skerdur. Orðingin "persónlig nýtsla" týðir, at veiðan ikki kann avreiðast um góðkenda innvigingarskipan, og at veiðan ikki kann latast øðrum móti samsýning í peningi ella øðrum, ið hevur peningaligt virði.

Roknað verður við, at einki mark er í støddini niðureftir og at tað verður møguligt sum nú at arbeiða seg inn í veiðiloyvisskipanina ella inn í íløgustuðul ella minstaforvinning við at uppfylla treytirnar. Ásettar verða felagskvotur fyri bátar undir 20 BRT, sum verða í trimum pørtum:

a) Teir við fullum veiðiloyvi,
b) Ein minni nøgd til bátar, sum hava avmarkað veiðiloyvi og sleppa teir at avreiða innanfyri nøgdina.
c) Teir, sum ikki hava veiðiloyvi og bert fiska til persónliga nýtslu.

ad § 7.

Dentur verður lagdur á, at livandi tilfeingið er ogn hjá føroysku tjóðini. Tað verður tí kravt, at ognarar av fiskiførum, sum eru teir, sum kunnu hava kvoturættindi, hava mest møguligt tilknýti til Føroyar.

Reglurnar fyri at skráseta skip í Føroyum eru, sambært løgtingslóg nr. 9 frá 5. mars 1970, sum broytt við løgtingslóg nr. 79. frá 10. mars 1992, at fyri at skip kann metast føroyskt og

sigla undir føroyskum tlaggi, má eigarin verða føroyskur. Sum føroyskur eigari verða mettir: Føroyingar, føroyskir landsstovnar og kommunuf. stovnanargrunnar og feløg, har bara føroyingar eru í leiðsluni, partsreiðarí, har føroyingar eiga í minsta lagi 2/3 og har fyrisitandi reiðarin er føroyingur, partafeløg og onnur vinnufeløg við avmarkaðari ábyrgd, sum hava valt eina nevnd, tá ið minsta lagi 2/3 av hesari eru føroyingar, ella onnur vinnufeløg, sum hava valt eina nevnd, tá ið minsta lagi 2/3 av hesari eru føroyingar. Um stovnanargrunnar, feløg ella vinnufeløg eru luttakarar í partsreiðarí ella í øðrum vinnufeløgum, má hvør einstakur luttakari lúka treytirnar fyri at vera mettur sum føroyskur eigari.

Fyri at hava møguleika at fylgja við hvør eigur skipini, sum hava veiðu- og fiskiloyvi, gerst hetta best við, at partabrøvini eru navnapartabrøv og at krevja, at ognarar eru føroyingar, og at broytingar í ognarviðurskiftunum skulu fráboðast landsstýrinum.

Í serstøkum førum kann landsstýrið gera undantak, t.d. um útlendingar hava áhuga at royna eftir fiskasløgum á leiðum, ið føroyingar ikki hava áhuga í, men sum kann koma at hava týdning fyri samfelagið seinri.

Stk. 4. Henda skiftisregla er neyðug fyri at tryggja, at teir persónar og tey feløg, sum hava havt fult veiðiloyvi í 1993, kunnu halda áfram við virksemi sínum. Við eigaraskifti seinni skulu treytirnar í stk. 1-3 verða loknar. Tað ber sostatt ikki til seinni at keypa felag ella skip, sum hevur fult veiðiloyvi í 1993, uttan at nýggju ognararnir lúka treytirnar um ognarviðurskifti í stk. 3.

ad § 8.

Stk. 1. Henda grein knýtir rættin til at eiga kvotupart og leiga og keypa kvotur til ognarar av fiskiførum við veiðiloyvi.

Stk. 2. Møguligt skal vera at endurnýggja fiskitlotan. Haraftrat er heimild í matvørulógini um løggilding av fiski og í lógini um skipatryggleikan viðvíkjandi teimum teknisku krøvunum.

ad § 9.

Høvuðsreglan er, at landsstýrið í kunngerð kann skipa fyri fiskiveiðuni á føroysku landleiðunum hjá føroyskum og útlendskum skipum. Haraftrat koma reglur um føroyska fiskiveiðu uttanfyri landleiðirnar.

Reglurnar verða um heildarkvotur smb. § 5, stk. 2, býtið av felagsárskvotum smb. § 5. stk. 5, sum eisini kunnu veiðast til ávísar tíðir t.d. vár, summar og heyst. Býtið millum bólkar, einstøk fiskifør og veiðihættir. Skyldu at lata inn veiðufráboðan, har fráboðanin altíð skal verða til Fiskiveiðieftirlitið.
Stk. 5, 6, 7 og 8 eru nakað tær somu sum løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978 og nærri reglur kunnu ásetast viðvíkjandi forboðnum eftir § 10, stk. 4 um at blaka veiðu fyri borð og hvørji dýra- og plantusløg koma undir bannið. Samstundis verður tikið upp, at eygleiðarar kunnu verða settir um borð á bæði føroysk og útlendsk skip. Eygleiðaraskipanin er longu galdandi og sett í verk fyri skipini á NAFO- økinum.

Fyri veiði- og fiskiloyvi kann ásetast avgreiðslugjald og brot á ovurveiðu kunnu revsast

fyrisitingarliga við at mótrokna í kvotu.

ad § 10.

Reglurnar í hesi grein eru fyri ein part tiknar beinleiðis frá § 2 í løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978 og fevna um føroysk og útlendsk skip. Fyri virking av veiðu og vøru hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi á landleiðunum og uttanfyri landleiðirnar og fyri útlendsk skip á landleiðunum krevst loyvi frá landsstýrinum.

Umskipan av vøru og fongi, virking, pakking og onnur handfaring um borð á fremmandum skipum á landleiðunum er forboðin, tó kann landsstýrið veita undantøk og samstundis seta treytir við. Hetta verður gjørt á hvørjum ári m.a. fyri russisk skip.

Forboðið eftir stk. 4 um at blaka veiði út aftur er nýtt. Landsstýrið heldur, at tað er sera umráðandi, at hetta forboð kemur inn í lógina í sambandi við kvotaskipanina. Endamálið við slíkum banni er at tryggja, at ikki meira verður veitt burtur úr fiskastovnunum, enn tað sum er lívfrøðiliga forsvarligt.

Landsstýrinum verður eftir § 9 heimilað at áseta nærri reglur um, hvussu bannið skal framjast.

Sum nakað nýtt verður skotið upp, at forboðið verður at uppskipa ella inntlyta fisk frá útlendskum skipum, sum er veiddur á havøkjum, sum føroysk skip ikki mugu veiða í vegna sínámillum avtalur og avtalur í altjóða fiskivinnunevndum.

ad § 11.

Høvuðsreglan er, at einki skip kann fara til fiskiskap uttan at hava veiðiloyvi og fiskiloyvi. Veiðiloyvi er rætturin, landsstýrið letur ávísum fiskifari at veiða á landleiðunum og uttanfyri landleiðirnar fyri eitt ár í senn. Fiskiloyvi ásetur nærri ta nøgd úr fiskastovnum, sum eitt skip, sum hevur veiðiloyvi, kann veiða eftir nærri ásettum treytum í fiskiloyvunum. Eitt skip kann bert hava eitt veiðiloyvi, men kann hava fleiri fiskiloyvir. Í kunngerð býtir landsstýrið veiðiloyvini upp í 2 partar eins og gjørt hevur verið higartil fyri veiði á føroysku landleiðunum og veiði uttanfyri landleiðirnar. Aftrat veiðiloyvinum skulu øll skip eisini hava eitt ella fleiri fiskiloyvir.

Stk. 2, ásetur, at fyri at fáa part í heildarkvotu krevst eisini, at loyvishavarin ræður yvir kvotu sambært § 5, stk. 5, 6 og 7, sum er felagskvota, árskvota ella hjáveiðukvota. Loyvistreytirnar eftir stk. 3 verða ásettar sambært gjørdum avtalum um, hvussu fiskiskapurin skal fara fram.

Stk. 4, er fyri skip undir fremmandum flaggi, sum fáa loyvi at veiða á føroysku landleiðunum, vanliga verða fleiri skip sett á ein lista frá avvarðandi landi, sum sínámillum fiskiveiðiavtala er gjørd við.

ad § 12.

Tann, ið ræður yvir egnum kvotaparti, má lata henda nýtslurætt aftur, uttan krav um

endurgjald, tá ið nýtslutíðarskeiðið er runnið.

Tá skeiðið er runnið, eigur kvotaparturin at verða bjóðaður út alment eftir serligum av landsstýrinum ásettum reglum.

ad § 13.

Forðað verður fyri at einstaklingar ella einstøk feløg eiga ella hava ræðið yvir so stórum parti av tilfeinginum, at hetta gevur eina monopolstøðu og avlagar marknaðarbúskapin.

ad § 14.

Út um tær vanligu inntøkurnar í vælskipaðum fiskiskapi er ein tilfeingisrenta, sum eigur at koma aftur til alla ta føroysku tjóðina. Afturfyri nýtslurættin til at vinna pening burturúr tilfeinginum, verður ein partur førdur aftur til alt samfelagið. Tilfeingisrentan broytist eftir støðuni í fiskastovnunum.

ad § 15.

Greinin ásetir rættin til at leiga, keypa og selja kvoturættindi, so at fiskiflotin kann laga seg til møguleikarnar og gera tað møguligt hjá fiskiførum at útvega sær eitt veiðigrundarlag, sum tryggjar positivan rakstur.

3-ára reglan skal tryggja, at persónar og feløg við kvoturættindum framhaldandi arbeiða í fiskivinnuni.

ad § 16.

Nærri reglur um leigu, keyp, sølu og flyting av loyvum og kvotum millum bólkar á landleiðunum og uttanfyri landleiðirnar við nevndu avmarkingum og framíhjárættindum.

ad § 17.

Kvoturættindi kunnu ikki arvast. Møguleiki verður fyri, at tá eigari doyr so kann tann, sum førir fiskifarið víðari fáa ein forrætt at vissa sær kvoturættindini.

ad § 20.

Tað eigur at verða frítt at avreiða uttanlands, um hetta gevur búskaparligan fyrimun. Tó kunnu ynski um arbeiðsmøguleikar í Føroyum gera tað neyðugt at avmarka vinningin av at avreiða uttan fyri Føroyar við at gera størri frádráti í kvotuni fyri hesar landingar.

ad § 21.

Fiskirannsóknarstovan eigur til eina og hvørja tíð at hava heimild at gera egnar royndir við egnum ella leigaðum skipum. Landsstýrið fyriskipar royndarveiðu og skal veita øll loyvir, herundir til skip, sum Fiskirannsóknarstovan ræður yvir, undantikið føroyskt skrásett fiskirannsóknarskip.

ad § 22.

Fyri hesi skip galda reglurnar um veiðiloyvi og fiskiloyvi við treytum ásettar í fiskiloyvinum.

ad § 23.

Lýsir regluligu gongdina tá heildarkvotur verða ásettar á føroysku landleiðunum fyri 5 ára kvotuskeið og mannagongdina, um neyðugt er at broyta heildarkvoturnar í kvotuskeiðinum.

ad §§ 24, 25 og 26.

Lýsir hvussu ásettar verða reglur fyri fiskifør úr londum, sum Føroyar hava sínámillum fiskiveiðisáttmálar við.

ad § 27

Lýsir hvussu veiðinøgdir fyri fiskifør undir føroyskum flaggi verða ásettar fyri veiðu uttan fyri føroysku landleiðirnar.

ad §§ 28, 29, 30.

Ásetir mannagongdina fyrstu ferð heildarkvotur, felags kvotupartar og egnir kvotupartar verða roknaðir út fyri kvotuskeiðið 1994 - 1998 á føroysku landleiðunum. Mest loyvda veiðan fyri fyrsta 5 ára kvotuskeiðið 1994-98 er tølini skotin upp í frágreiðingini hjá Bygnaðarnevndini. Tað hevur tó víst seg við seinni eftirkanning á Fiskirannsóknarstovuni, at onkur skeivleiki er komin í tølini fyri longu, brosmu, blálongu og kongafisk í frágreiðingini frá Bygnaðarnevndini, helst ivi um útlendsk veiða undir Føroyum skuldi roknast uppí ella ikki. Niðanfyri verða tølini hjá Bygnaðarnevndini endurgivin og síðani røttu tølini.

	Bygnaðarnevndin	**Rættað**
Kongafiskur	12.300	14.500
Blálonga	3.500	5.000
Brosma	6.000	5.800
Longa	2.700	4.200

Fyri at fáa heildarkvotuna fyri føroysk fiskifør, skal dragast frá veiðan hjá skipum undir fremmandum flaggi, sum fiska sambært sínámillum fiskiveiðuavtalum á landleiðunum. (Miðaltøl fyri 1990-1992).

	Kvota	**Útl. veiða**	**Heildarkv.**
Toskur á landgrunninum	7.000	200	6.800
Toskur á Føroya Banka	1.400	0	1.400
Hýsa	6.200	200	6.000
Upsi	42.000	500	41.500
Kongafiskur	14.500	1.200	13.300
Blálonga	5.000	1.500	3.500
Brosma	5.800	2.100	3.700
Longa	4.200	2.100	2.100

Um toskin á Føroya Banka sigur Bygnaðarnevndin, at mest loyvda veiðan í 1998 kann verða 2.800 tons. Um kvotan veksur úr teimum 500 tonsunum í 1993 í 2.000 tons í 1998, verður miðalveiðan í tíðarskeiðinum 1.400 tons.

ad § 31.

Ásetir mannagongdina hvussu verður farið fram á leiðunum uttan fyri føroysku landleiðirnar.

ad § 33.

Landsstýrið kann við hesi grein krevja, at **allar** upplýsingar um veiðu frá føroyskum skipum og frá útlendskum skipum, sum koma til Føroyar til upplegging, umskipan ella fyribils goymslu (transit) verða latnar til hagfrøðilig og eftirlits endamál. Tað áliggur skiparanum á skipinum at prógva, at veiðutølini eru rætt ført í kvotudagbók og uppgivin til fiskiveiðieftirlitið og fiskakeyparar hava skyldu at lata allar upplýsingar inn, eisini fyri útlendskar landingar í Føroyum.

Øll veiðitøl verða latin fiskiveiðieftirlitinum, sum síðani letur Hagstovuni tilfarið.

ad § 34.

Fiskiveiðieftirlitið verður samskipað í ein stovn og koma allar eftirlitsuppgávurnar undir hendi. Fiskiveiðieftirlitið skal samskipa allar uppgávur um eftirlitið á sjógv og landi. Hesar uppgávur verða í dag røktar av Fiskivinnustovuni, Vaktar- og bjargingartænastuni og skrivstovuni hjá Lønjavningargrunninum. Fiskiveiðieftirlitið skal gera møguligar avtalur við aðrar stovnar og donsku sjóverjuna undir Føroyum. Haraftrat skal fiskiveiðieftirlitið hava eftirlit við øðrum, sum kann hava árin á fiskiveiði.

ad § 35.

Fiskiveiðieftirlitið ansar eftir øllum reglum og loyvistreytum eftir hesi lóg og umsitur veiði- og fiskiloyvisskipanina og annað, sum landsstýrið leggur stovninum til.

ad § 36.

Fiskiveiðieftirlitið fær heimild til at steðga fiskiskipum og fiskaflutningsskipum og fara um borð á hesi sum ein liður í eftilitsarbeiðinum, sum fevnir um eftirlit við veiðu, reiðskapi og øllum vanligum skipsskjølum og kravdum kvota- og framleiðsluskjølum. Heimild verður samstundis givin til at taka skip inn til nærri kanningar.

Heimildirnar hjá Fiskiveiðieftirlitinum í stk. 2 eru tiknar úr løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978, tó er ungfiskaveiðibann økt til 14 dagar í senn.

ad § 37.

Eygleiðaraskipanin er umrødd undir § 9 og verður ein partur av arbeiðinum hjá fiskiveiðieftirlitinum, galdandi fyri føroysk og útlendsk skip á landleiðunum og føroyskum skipum uttan fyri landleiðirnar, har hetta sambært við góðkendar avtalur.

Fiskiveiðieftirlitið ber kostnaðin fyri eygleiðarar, sum hava rætt til frían kost og uppihald frá skipinum ta tíðina, hesir eru um borð.

ad § 38.

Hesar reglur verða mettar neyðugar í eini kvotaskipan, har útblaking av veiðu kann koma fyri. Reglurnar skulu tó ikki darva skipinum at fiska sína kvotu.

ad § 39.

Reglurnar heimilað landsstýrinum at áseta nærri regiur um at forða fyri, at ólóglig veiða verður umskipa til onnur fiskifør, um hesi ikki hava veiðirættindir ella ikki eru í vinnu. Um eitt skip kemur at veiða útum egna kvotu av ávum, sum ein ikki fær vart seg ímóti skal slík veiða verða fráboðað.

ad § 40.

Reglan er tikin beinleiðis frá verandi reglum í løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978.

ad §§ 41, 42, 43, 44, 45, 46, 47, 48 og 49.

Revsireglurnar eru sum í verandi lóggávu revsing við bót v.m, um ikki harðari revsing er ásett eftir aðrari lóg.

Landsstýrið hevur í tveimum førum lagt upp til harðastu revsing, sum er bót og at allur fiskireiðskapur og fongur kemur undir konfiskatión, tá skip veiða á stongdari leið og tá brot verður framt á forboðið um útblaking av veiðu. Í seinna førinum verður veiði- og fiskiloyvi haraftrat tikið inn treytaleyst beinanvegin, um fiskiveiðieftirlitið staðfestur brot á forboðið um útblaking av veiðu. Landsstýrið kann eisini mótrokna virði á teirri mettu veiðuni.

Revsingin fyri brot á ungfiskareglurnar eru tær somu sum higartil, tó verður skotið upp, at loyvi kann vera tikið aftur upp til 3 vikur í senn.

Avgerðir tiknar fyrisitingarliga kunnu kærast inn fyri dómsvaldið við eini kærufreist.

Grov brot sum útblaking av fiski, brot á ungfiskareglurnar uppísaman eiga at hava við sær, at veiðirættindi verða tikin aftur.

Brot á reglurnar um ovveiðu fevna um veiðu á føroysku landleiðunum og fyri føroysk skip uttan fyri landleiðirnar. Ovveiða og útblaking av veiðu hevur við sær, at veiði- og fiskiloyvi verður tikið og landsstýrið mótroknar nøgdirnar í komandi kvotum. Kvotuhavarin má bera ábyrgdina við minni kvotu og verður slík kvota seld ella útleigað, so kann endurgjald ikki verða kravt frá landsstýrinum, hóast keyparin er í góðari trúgv.

Landsstýrið kann áseta reglur um, at avgerðir tiknar fyrisitingarliga ikki kunnu kærast til landsstýrið.

ad § 50.

Lógin eigur at koma í gildi 1. januar 1994 og fara núgaldandi fiskivinnulógir úr gildi. Tað verður í stk. 2 skotið upp, at núgaldandi kunngerðir framvegis eru í gildi í tann mun, hesar ikki eru mótstríðandi við hesa lóg. Hesar kunngerðir fara síðani úr gildi so hvørt sum nýggjar kunngerðir koma í gildi.

1. viðgerð 21. desember 1993. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 23. desember 1993 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. desember 1993 og eftir 1. viðgerð 21. desember 1993 beint í fiskivinnunevndina.

Fiskivinnunevndin hevur viðgjørt málið. Nevndin hevur undir viðgerðini havt fund við hesi fiskiveiðufeløg:

Útróðrarfelagið eystan Múla
Klaksvíkar Útróðrarfelag
Meginfelag Útróðrarmanna (MÚ)
felagið "Snelluskip"
felagið "Línuskip"
felagið "Trolskip" og
felagið "Troibátur"

Undir viðgerðini hevur nevndin eisini havt fund við manningarfeløgini:
Føroya Fiskimannafelag og
Føroya Skipara- og Navigatørfelag

Undir viðgerðini hevur nevndin somuleiðis havt fund við umboð fyri:
Føroya Reiðarafelag
P/F Føroya Banki
P/F Sjóvinnubankin og
Bygnaðarnevndina

Omanfyri nevndu fiskivinnu- og manningarfeløg taka sum heild ikki undir við lógaruppskoti landsstýrisins.

Umboðini fyri **Klaksvíkar Útróðrarfelag** og **Útróðrarfelagið eystan Múla** søgdu seg ikki at kunna taka undir við, at kvotur verða ásettar til hvønn útróðrarbátin. Tað er í lagi at alt, sum gerast kann, verður gjørt fyri at fáa stovnarnar uppaftur, men ein kvotaskipan fær ikki stovnarnar uppaftur, tvørtur í móti. Besti háttur at røkja stovnarnar er, at fiska við húki og at koyra trolaraflotan út á djúpt vatn. Húkaveiðan regulerar seg sjálv, streymur og veður ávirka, hvussu nógv roynt verður. Verður ein kvotaskipan sett í verk, er vandi fyri, at fiskur verður kastaður útaftur, søgdu umboðini fyri Klaksvíkar Útróðrarfelag og Útróðrarfelagið

eystan Múla, sum eisini mæltu til, um mest loyvda veiða verður ásett, so at MLV bert verður ásett fyri eitt ár í senn.

Meginfelag Útróðrarmanna, MÚ, vísir á, at útróðurin hevur troytt landgrunnin síðani landnám, meðan eitt nú føroyski trolaraflotin fyrst kemur inn á grunnarnar frá miðskeiðis í 1970-árunum, og síðan tá hevur hann bert fingið fleiri og fleiri rættindi, alt meðan útróðrarflotin er trongdur meira og meira upp í ein krók.

Samstundis hendir tann sorgarleikur, at hesin sami trolarafloti saman við fiskaðartrolaraflota, sum er, hevur oytt alt livandi á grunnum okkara og tí er støðan, sum hon er í dag.

Skal talan verða um nøkur søgulig rættindi, so er útróðrarflotin tann, sum hevur so nógv tær longstu tradiónirnar/siðvenjuna at troyta landgrunnin, og má hetta sjálvsagt takast við í myndina í samband við tey søguligu rættindi, og aftur til 1964 má undir øllum umstøðum farast, tá fiskimarkið varð flutt út á 12 fjórðingar.

Eitt annað, sum hædd skal takast fyri, er, at tey fiskasløgini, sum verða kvoterað, eru tey fiskasløg, sum útróðrartlotin í stóran mun fiskar, nevniliga tosk, hýsu og upsa, og tað eru hesir stovnar, sum eru niðurfiskaðir av trolarunum, so einki er eftir av hesum fiskasløgum.

Fyrsta treytin, ið lúkast skal, fyri at fáa fiskastovnarnar upp aftur á tað støði, teir eiga at vera á, er, at løgtingið setir bann fyri at fiska við smámeskaðum troli á føroyskum sjóøki. Í hesum døgum má tað haldast at verða løgið fyri ikki at siga ábyrgdarleyst av Føroya landsstýri at geva loyvi til, at toska- og hýsuyngul verður fiskaður við smámeskaðum troli til fiðnað, samstundis sum kvotur nú skulu setast á allan hin fiskiflotan, sum fiskar henda fisk sum vaksnan fisk, og løgtingið samstundis lóggevur um, at aðrir trolarar skulu brúka 140 mm meskar á somu leiðum, og at aðrir føroyskir fiskimenn skulu missa burtur av sínum kvotum til hesi skip, fyri at teir kunnu hava eina kvotu í Norðsjónum, sum er 40.000 tons av hvítingsbróður. Sagt við øðrum orðum, eins stóra kvotur sum allur tann føroyski flotin hevur av upsa undir Føroyum. Hetta verður undir ongum umstøðum góðtikið, fiðnaðartrolararnir mugu burtur úr føroyskum sjóøki.

Onnur treytin er, at øll troling innanfyri 12 fjórðinga fiskimarkið verður støðgað. Hesar treytir mugu lúkast, áðrenn farið verður undir at býta fiskikvotir við Føroyar, sigur MeginFelag Útróðrarmanna.

Felagið Snelluskip sigur, at samansetingin av fiskiflotanum í dag er tann politiskt torførasti spurningurin at loysa, ikki at greina, hvussu hann er samansettur nú, men hvussu hann skal síggja út í framtíðini. Tað vóru nógvir, sum settu sítt álit á, at bygnaðarnevndin skuldi definera framtíðar fiskiflotan, men hon vildi ikki taka støðu til henda spurningin. Hon ráddi til at seta umsetiligar kvotur á fyri tey einstøku skipini og so við marknaðar búskapi sum grundarlag, at fáa eina útreinsan í flotanum.

Men hvussu fáa vit marknaðarbúskap við politiskum "kompromis" samtyktum kvotum, har hvør hyppar sína veltu? Henda støðan má koma, um politikararnir ikki klárt siga, hvussu flotin skal verða samansettur. Eitt so týdningarmikið mál við so stórari búskaparligari ávirkan á okkara høvuðsvinnu, átti at fingið eina tvørpolitiska viðgerð og semju, sum so varð løgd fyri løgtingið og samtykt við stórum meiriluta.

Hetta var landsstýrið ikki ført fyri, men hevur lagt fyri tingið uppskot um umsetiligar handils kvotur, bygdar á søgulig tøl fyri tað einstaka fiskifarið. Hetta sær rætt og rímiligt út, men um hugt verður eftir, hvørji fiskasløg kvoterað verða, eru ikki nógvar reglur av søgu eftir at skriva um húkaveiðuna. Um ikki broyting kemur í hugsunarháttin hjá teimum, ið skipa fyri fiskivinnuni í Føroyum í framtíðini, kunnu vit siga, at húkaveiðan er søga. Annars verður víst til frágreiðingina frá felagnum, sum er útbýtt í løgtinginum.

Felagið Línuskip segði seg verða harðliga ímóti fyriliggjandi uppskoti um kvotaskipan. Eftir uppskotinum hava skipini ongan møguleika at klára seg fíggjarliga. Tað er ikki neyðugt at kvotera húkaveiðuna, tí hon avmarkar seg sjálv. Kvotaskipan avmarkar ikki veiðitrýstið, tí stórur vandi er fyri, at fiskur verður blakaður útaftur, um skipini skulu halda ásettu kvoturnar. Rættast er at gera tekniskar reguleringar, so sum skipanin við trolfríum leiðum, so fiskastovnarnir fáa frið at koma fyri seg aftur. Felagið Línuskip mælti frá at áseta TAC fyri fimm ár í senn, tað má gerast yvir stytri tíðarskeið. Eisini má vinnan hava fleksiblar reglur at arbeiða eftir, segði felagið Línuskip.

Felagið Trolskip vísti á semjuna, sum varð gjørd um trolfrí økir á landleiðini, har feløgini, sum vóru við í hesi semju søgdu, at tey vóru samd um at mótmæla, at kvotaskipan verður sett í verk. Føroyingar eru í móti kvotum. Felagið Trolskip helt ikki, at tað er rætt at seta kvotur á fiskastovnar, sum ikki eru hóttir. Felagið mælti til, at kvotur verða settar á toska- og hýsuveiðina, og at TAC verður sett á hinar fiskastovnarnar. Tað er ikki rætt, at Fiskirannsóknarstovan einsamøll skal áseta mest loyvdu veiðu (TAC). Hetta eigur at verða gjørt saman við í minsta lagi fiskivinnunevndini og eigur vinnan eisini at verða við at áseta TAC. Annars varð víst á, at við tekniskum reguleringum ber til at røkja fiskastovnarnar, og vísti umboðið fyri felagið Trolskip á, at orsøkin til, at upsastovnurin er so væl fyri, sum hann er í løtuni, stavar frá teimum teknisku reguleringum, sum hava verið.

Felagið Trolbátur tekur heldur ikki undir við, at kvotur verða ásettar. Felagið vísti á, at frágreiðingin frá Bygnaðarnevndini mælir til at avmarka veiðitrýstið. Ein kvotaskipan, sum henda, skotin er upp, avmarkar ikki veiðitrýstið. Felagið vísti á kvotaskipanir í øðrum londum, eitt nú í Íslandi og í ES, og hildu teir ikki, at hesar skipanir hava riggað nóg væl. Felagið hevur eisini sent skriv til løgtingið, har felagið heitir á løgtingið um at áseta TAC fyri tosk á landgrunninum til minst 12.000 tons árliga, og hýsu á landgrunninum til minst 8.000 tons árliga. Felagið sigur, at ein orsøk til stóru niðurgongdina í toska- og hýsufiskiskapinum, kemur av nógvu friðingunum av bestu toska- og hýsuleiðunum, sum verið hava.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag kann ikki góðtaka, at persónar og/ella feløg kunnu keypa eina kvotu og selja kvotuna/fiskin víðari, uttan sjálvir at veiða fiskin.

Verða umsetiligar kvotur, so eigur løgtingsins fiskivinnunevnd at kunna tilluta skipaeigarum ávísa kvotu til egna nýtslu.

Tað kann undir ongum umstøðum góðtakast, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum/-fiskivinnustjórin skulu umsita býtið av kvotum, men má kvotabýtið, um tað verður veruleiki, leggjast undir løgtingsins fiskivinnunevnd.

Sambært lógaruppskotinum kann eingin eiga ella ráða yvir meira enn 10% av øllum heildarkvotum á føroysku landleiðunum, men samstundis stendur óbeinleiðis, at møguleiki

er hjá nøkrum fáum fólkum at eiga heildarkvotuna, sum annars skuldi verið ogn hjá allari føroysku tjóðini. Hesum kann Føroya Skipara- og Návigatørfelag undir ongum umstøðum taka undir við.

Føroya Fiskimannafelag signr, at grundgevingarnar fyri framlagda uppskotinum eru, at minka um veiðitrýstið og at laga flotan til tilfeingið. Men verður hugt eftir uppskotnu kvotunum sammet við veruligu veiðuna í 1993 er úrslitið, at í 1993 vórðu fiskað 16.600 tons minni av teimum fiskasløgum, ið ætlanin er at kvotera, enn mælt verður til í lógaruppskotinum at fiska í 1994. Hetta tekur í verulcikanum grundarlagið undan tørvinum fyri eini kvotaskipan, sum teirri, ið skotin er upp.

Skal nakað gerast, hóast hetta, kundi tað verið, at sett eitt TAC fyri trolaraflotan, og annars at lata verandi húkaflota fiska frítt út frá tí sjónarmiðinum, at húkurin regulerar seg sjálvan, hvat stovnsrøkt viðvíkur. Tá slepst undan einum bardaga millum húk og trol um prosentpartar.

Føroya Fiskimannafelag er avgjørt ímóti handilskvotum. Fyrst og fremst tí at ikki er mett um avleiðingarnar av hesum. Mett verður, at ein slík skipan kemur at merkja enn færri arbeiðspláss, samstundis sum vit ikki í 1993 veiddu ta kvotu, sum fiskifrøðingar mæla til. Royndirnar í Íslandi vísa annars, at handilskvotur fyrst og fremst ganga útyvir áhugamálini hjá fiskimonnum, og hetta fara fiskimenn ikki at finna seg í. Politikkurin skuldi annars verið tann, at vit nýttu allar teir møguleikar, sum finnast og at lagdur verður ein fiskivinnupolitikkur hareftir.

Føroya Fiskimannafelag vísir á, at sambært uppskotinum skal takast forskot upp á nýggju stýrisskipanina, har landsstýrið avger stórt sæð alt í fiskivinnumálum. Vit meta, at ein slík skipan er treytað av eini skipaðari fiskivinnuumsiting. So leingi vit ikka hava hana, er tað óráð at taka fiskivinnunevndina burtur úr avgerðarprosessini. Sambært uppskotinum skulu fiskivinnufeløgini missa teirra høyringsrætt og hesum mótmælir Føroya Fiskimannafelag harðliga.

Føroya Reiðarafelag vísti á, at fiskiskapurin í 1993 er væl lægri enn nøgdirnar, sum skotið verður upp at fiska í 1994. Sum fiskiskapurin hevur verið í 1993, er ikki neyðugt at seta nakrar avmarkingar ella kvotur í verk. Reiðarfelagið mælti frá í verandi støðu at seta kvotaskipan í verk. Ein skipan við handilskvotum avmarkar ikki fiskiskipaflotan. At seta hesa skipan í verk nú, gagnar ikki tí føroyska samfelagnum. Harafturímóti eru tekniskar reguleringar við friðingum í gýtingartíðini og friðing av ungfiski gagnligar.

Reiðarafelagið mælti eisini til, at "nevndin" í uppskoti landsstýrisins verður vald av vinnuni. Umráðandi er, at skipanin framhaldandi fær undirtøku frá vinnuni, og hetta halda vit verður best tryggjað við, at feløgini manna hesa nevnd í staðin fyri, at skiftandi landsstýri útpeika ávísar persónar, sum møguliga ikki hava undirtøku í vinnuni. Eisini kunnu feløgini útpeika persónar at viðgera ávís mál, sum nevndin ikki hevur førleika til at viðgera sigur Reiðarafelagið.

Umboðini fyri **P/F Føroya Banka og P/F Sjóvinnubankan** vístu á, at tað er ikki rætt, at kvotur ella kvotapartar ikki kunnu setast í veð. Bankarnir vístu á, at vandi er fyri, at útlendskir fiskakeyparar koma inn og læna til fiskiskip, treytað av, at teir keypa veiðuna, og

skipini fara uttanlanda at avreiða, og førir tað við sær, at vit missa arbeiðspláss innan fiskifdnaðin. Bankarnir mæla til, at kvoturnar verða so umsetiligar sum gjørligt og mæla frá, at kvotur verða knýttar at skipunum.

Umboðini fyri **Bygnaðarnevndina** greiddu frá arbeiðinum í nevndini. Sagt varð, at nevndin var samd um frágreiðingina, tó hevði tann eini nevndarlimurin, sum umboðaði felagið Trolskip, tikið fyrivarni viðvíkjandi keypi av kvotum. Hann mælti til, at keyparin skal vera føroyingur og at minst 51% á keyparasíðu verða fiskimaður/menn.

Fiskivinnunevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Jógvan Adolf Johannessen, Henrik Old og Karl Heri Joensen) førir fram: Lógaruppskot landsstýrisins byggir á frágreiðingina hjá Bygnaðarnevndini, sum var til viðgerðar í løgtinginum 7. september 1993. Undir hesi viðgerð kom fram, at tað var ikki ein einasti tingmaður, sum tók undir við frágreiðingini frá Bygnaðarnevndini. Frágreiðingin hjá bygnaðarnevndini er stórt sæð ein avskrift av frágreiðingini hjá fiskifrøðingum og øðrum frá 1991 "**Skilagóð stovnsrøkt og skilagóð stýring av fiskivinnuni - gagnligur fiskivinnupolitikkur**". Hetta er ein væl skipað frágreiðing, sum lýsir fiskastovnar og úrtøkumøguleikar teirra lívfrøðiliga og búskaparliga sera nágreinliga. Eisini lýsir henda frágreiðing ymisk alternativ stýringstiltøk, so sum rættin at fiska, friðað økir, avmarkað fiskidagatal, heildarkvotur/handilskvotur, ráfiskabýti, fiskiloyvir o.s.fr.

Henda frágreiðing hevur fingið sera lítla umtalu í mun til frágreiðingina hjá Bygnaðarnevndini, sjálvt um tann seinna beinleiðis byggir á ta fyrru.

At Bygnaðarnevndin skuldi setast, er ein avtala, gjørd í millum donsku stjórnina og undanfarnu samgongu 1. februar 1993. Tað vil við øðrum orðum siga, at tveir av samgonguflokkunum ongan lut eiga í hesi nevnd og kunnu tí ikki føla seg bundnar av hesi frágreiðing á sama hátt sum undanfarna samgonga, um hon hevði hildið fram.

Meirilutin ásannar, at havið innanfyri 200 fjórðinga fiskimark okkara er ikki ein ótømandi brunnur. Eins og fiskastovnarnir á øllum heimsins fiskileiðum eru avmarkaðir í støddd, so er hetta okkara lívsgrundarlag avmarkað. Fara royndirnar upp um eitt ávíst mark fleiri fylgjandi ár, verður stovnurin ovveiddur, sum svíður at veiðimongdini og harvið úrtøkuni í framtíðini. Veruleikin er helst tann at, ið hvussu so er toska- og hýsustovnarnir eru ov hart troyttir undir teimum náttúruviðuskiftum valdað hava seinastu árini. Úrslitið er, at úrtøkan er minkað ár fyri ár, seinastu fýra til fimm árini.

Fyrsta takið verður tí at fáa hesar stovnar uppaftur. Seinastu árini eru stór tiltøk gjørd fyri at uppbyggja serliga toskastovnin við at friða á gýtingargrunnunum í gýtingartíðini. Fyrst í januar í ár vórðu fýra stór økir friðað fyri trol alt árið, eitt í hvørja ætt, løgtingsmál nr. 149/1992: Fýra trolfrí øki á landleiðini.

Meginreglan í fiskivinnupolitikki okkara má vera tann, at vit røkja og nýta fiskiríkidømi landgrunsins á slíkan hátt, at hetta ríkidømi verður varðveitt og umsitið sum varandi grundarlag undir føroyska búskapinum, at royndirnar verða ikki størri enn fiskastovnarnir tola, at teir fiskastovnar, ið nú eru ovveiddir, verða uppafturbygdir, at støddd og samanseting

veiðiflotans verður lagað eftir hesum møguleikum.

Tær lívfrøðiligu umstøðurnar síggja út til at vera betri í ár, enn tær hava verið undanfarin ár, tað sær eisini út til, at toskastovnurin er í menning.

Sagt hevur verið, at ongin tjóð er meira bundin av skilagóðari stovnsrøkt enn hin føroyska, og er hetta rætt. Hinvegin hava vit ikki ráð at velja skeivt, tá talan er um at umsita okkara lívsgrundarlag.

Meirilutin ásannar, at tað er ein sera tung ábyrgd, sum er løgd á samgonguflokkarnar, nú lógin um Føroya framtíð skal samtykkjast á Føroya løgtingi.

Fiskivinnan er okkara høvuðsvinna, tað er tí sera óheppið, at skula gera so grundleggjandi broytingar í slíkum skundi, sum talan hevur verið um. Herafturat kemur, at tað er so gott sum eingin kunning farin fram úti um landið, so nógvir fiski- og útróðrarmenn vita illa nokk, hvat hetta nýggja lógarverkið gongur út uppá. Politikararnir eru heldur ikki nóg væl kunnaðir tí tíðin, frá tí, lógin varð framløgd til hon skuldi samtykkjast, hevur verið alt ov stutt.

Løgtingið hevur áður viðgjørt og samtykt tær avtalur, sum eru gjørdar við donsku ríkisstjórnina síðani 1. februar í 1993 og nú seinast 12. oktober 1993, sum er soljóðandi:

> "Som opfølgning på aftalen af 1. februar 1993 har landsstyret tilsluttet sig anbefalingerne fra Strukturudvalget om fiskerierhvervet og fremsætter i overensstemmelse hermed lovforslag om omsættelige fangstkvoter med virkning fra 1. januar 1994. På længere sigt vil landsstyret overveje at opnå provenu i forbindelse med fangstkvoter."

Her er ikki sagt, at vit skulu hava handilskvotur, men umsetiligar kvotur.

Meirilutin ásannar, at tað er eingin politiskur meiriluti á Føroya løgtingi, sum tekur undir við handilskvotum. Hetta átti landsstýrið eisini at verið vitandi um, tí, sum áður nevnt, fekk frágreiðingin frá Bygnaðarnevndini eina viðgerð í løgtinginum 7. september 1993, tá var tað ikki ein einasti løgtingsmaður, sum tók undir við frágreiðingini í verandi líki. Í tí sum fiskivinnuleløgini hava ført fram í hesum máli, er støðan tann sama, tað er einki felag, sum tekur undir við lógaruppskoti landsstýrisins í verandi líki.

Meirilutin er tí samdur um at broyta uppskot landsstýrisins.

Ásannandi at lítið ella einki avlop er í veiðilíðinum, heldur meirilutin ikki, at hetta er ført fyri at fíggja eina umsetiligheit sum hana, landsstýrið skjýtur upp, har einstaklingar og felløg, sum ikki beinleiðis eru í veiðuliði vinnunnar, kunnu ráða yvir kvotum.

Meirilutin mælir tí til, at veiðifar við veiði- og fiskiloyvi í hvørjum nýggjum kvotuári hevur rætt til at fáa kvotupart av nýggjum. Í veiðiárinum skal hesin kortini verða frítt umsetiligur, og velur eigari av fiskifari tvey ár á rað at avhenda kvotu sína, fellur kvotan ella kvotuparturin aftur til felagskvotuna og kann býtast tí flota, sum heldur fram við veiðu í kvoteraða stovninum.

Meirilutin heldur ikki, tað eigur at bera nøkrum til beinleiðis at keypa arbeiðspláss undan

øðrum bert við at bjóða nóg høgt fyri kvotu, sum landsstýrið sigur, ikki kann verða privat ogn. At nýtsla av kvotum bert skal verða ein tilluťaður brúksrættur í avmarkaða tíð, tekur meirilutin undir við.

Í mun til uppskot landsstýrisins um eitt kvotuár, ið fylgir kalendaranum, heldur meirilutin, at rætt er at leggja kvotuárið ímillum 1. september og 31. august. Hetta er úr fiskasølusjónarmiði skilabetri, tí trýstið á marknaðarprísirnar er oftа sera stórt, tá størri veiðutjóðir byrja kvotuár sítt.

Í okkara føri verður soleiðis neyðugt at royna eitt hálvt kvotuár frá 1. mars til 31. august í ár. Avleiðing av hesum er, at fyri hetta hálva kvotuár má ásetast ein MLV, ið er lutfalsliga ásett út frá tilmælinum um árs-MLV-ið.

Landsstýrið hevur skotið upp at nýta søgulig tøl sum grundarlag fyri tillutan av kvotum, bæði í teim skipabólkum, har tvingið býti í millum skip er ásett, og teim, har valfrælsi er ætlað einstaka skipinum í skipabólkinum.

Meirilutin heldur slíka skipan vera sera órættvísa og tað av fleiri grundum.

Søguligu tølini eru torfør at prógva, tí hagtalsskipan okkara - ið er sera ung - enn er ófullfíggjað til at lítast kann á hana, og er fyrst býti endaliga, er ógjørligt at ræsta brek, har menn kunnu prógva, at teir hava verið fyri vanbýti.

Søguligu tølini eru heldur ikki mát fyri, hvussu dugnaliga menn hava roynt, royndir í øðrum stovnum, brek á veiðufari, umbyggingar, fíggjartrupulleikar og so mangt annað hava ávirkað søguligu tølini, so tey ikki eru mát fyri veiðuorkuna hjá einstaka farinum.

Serliga óheppið og órættvíst er býtið eftir søguligari veiðu, tá havt verður í huga, at menn ikki hava havt høvi til at seta seg best møguligt fyri søguliga. Eingin hugsaði um, at somu myndugleikar, sum hava mælt til, at "alternativar" royndir verða gjørdar, heilt ótilvitað, koma at revsa slíkar royndir.

Meirilutin heldur, at neyðugt er at býta trolarapartin av MLV-num sambært § 28 í millum stakar trolarar og partrolarar, og síðan í hvørjum bólki sær at býta í millum einstøku skipini eftir ávísum býtislykli, sum t.d. bólkar skipini í hóskandi undirbólkar, har førini fáa sama tonsatal í kvotu.

<u>Viðmerkingar til broytingarnar í teimum ymisku kapitlunum.</u>

ad. kap. 1
Stk. 3 í § 2 er nýtt stykki, sum meirilutin mælir til at seta inn í lógina. Grundgevingin fyri hesum er, at tað er av sera stórum týdningi, at føroyingar gera seg galdandi á havleiðum í altjóða sjógvi, har ongar avmarkingar eru orsakað av altjóða avtalum, sum Føroyar eru partur í. Endamálið er at tryggja okkum søgulig tøl, tá MLV verður ásett. Hugsað verður t. d. um Irmingarhavið og Hatton Bank.

Høvuðsbroytingarnar hjá meirilutanum í § 5 eru tvær. Onnur broytingin er, at kvotabýtið ikki verður gjørt út frá søguligum tølum, tá meirilutin fyri tað fyrsta er vitandi um, at

hagtølini ikki eru álítandi, fyri tað annað er vitandi um skip, sum hava roynt aðrar veiðumøguleikar, og tískil verða við skerdan lut í eitt søguligum býti. Eisini kann nevnast, at nógv skip hava ligið orsakað av fíggjarligari trongstøðu, eitt av øðrum orsøkum hava ligið í stytri ella longri tíðarskeið. Hin broytingin er, at Fiskirannsóknarstovan ikki einsamøll ger tilmæli um MLV, men at serstakt tilmæli eisini verður gjørt av eini Stovnsrøktarnevnd, út frá egnum royndum og vísindaligum metingum. Stovnsrøktarnevndin í stk. 9, sum er eitt nýtt stk. í lógini, verður samansett av umboðum fyri fiskiveiðifeløgini. Nevndin hevur fýra limir. Tveir umboða húkaveiðuna og tveir umboða trolveiðuna. Feløgini hugsað verður um, eru t. d. Felagið Stállínuskip, Meginfelag Útróðramanna, Felagið Trolskip og Felagið Snelluskip. Landsstýrið velur Stovnsrøktarnevndina eftir tilmæli frá fiskiveiðufeløgunum, og ger reglugerð um val og virki nevndarinnar.

Í § 6 mælir meirilutin til eina nýggja orðing, soleiðis at tey, sum ætla sær at avreiða skulu hava møguleikan fyri at fáa veiðu- og fiskiloyvi. Henda veiða fer burturav felagskvota-partinum hjá útróðrabátum undir 20 BRT. Viðvíkjandi teimum, ið bert veiða til egna nýtslu, heldur meirilutin, at teirra partur eigur at verða hildin uttanfyri ásetta MLV-ið. Meirilutin mælir til, at orðini "til persónliga nýtslu" verða broytt til "til húsbrúks".

Meirilutin leggur herðslu á viðmerkingar landsstýrisins til § 6 í lógaruppskotinum, sum eru soljóðandi:

"Reglan er ætlað at tryggjað, at aldargamli rætturin at søkja sjógvin til egna nýtslu ikki verður skerdur." Og seinni í viðmerkingunum verður sagt: "Roknað verður við, at onki mark er í støddini niðureftir, og at tað verður møguligt sum nú, at arbeiða seg inn í veiðuloyvis-skipanina ella inn í fløgustuðul ella minstaforvinning við at uppfylla treytirnar. Ásettar verða felagskvotur fyri bátar undir 20 BRT, sum verða í trimum pørtum:
a) Teir við fullum veiðiloyvi.
b) Ein minni nøgd til bátar, sum hava avmarkað veiðiloyvi og sleppa teir at avreiða innanfyri nøgdina.
c) Teir, sum ikki hava veiðiloyvi og bert fiska til persónliga nýtslu."

Í § 7 mælir meirilutin til, at orðið ognarar, sum fleiri ferðir kemur fyri í hesi grein, verður broytt til eigarar. Orsøkin til hesa broyting er, at orðið "ognarar" eisini hevur annan týdning, t. d. í roknskaparviðurskiftum (kreditor). Eisini verður mælt til at broyta stk. 3, punkt 2 soleiðis, at har, sum landsstýrið hevur skotið upp, at 2/3 av eigarunum skulu lúka treytirnar í stk. 2, verður broytt til, at í minsta lagi meirilutin av eigarunum skal lúka treytirnar í stk. 2.

Eftir galdandi lóg - Lóg nr. 8 frá 29. mai 1978 um fiskiveiðu á landleiðini - hevur landsstýrið heimild at skipa fyri fiskiskapinum á landleiðini eftir samráð við løgtingsins fiskivinnunevnd. Meirilutin heldur, at hendan skipan eigur at halda fram og mælir til, at punkt 5 í § 9 verður broytt og sett sum nýtt stk. 2 í § 9, har heimilað verður landsstýrinum saman við løgtingsins fiskivinnunevnd við kunngerð at áseta reglur um hvussu fiskiskapurin skal fara fram, reglur um minstamát, friðað øki, friðingartíðir, fiskireiðskap og nýtslu hansara og veiðihættir.

Sambært reglunum í hesi grein, er bann fyri at blaka veiðu út. Um fiskifar kemur so fyri, at partur av veiðuni er í stríð við reglurnar í lógini, skal hesin kortini førast til lands, uttan at hetta nervar heildarkvotu ella egna kvotu hjá ávíkavist skipabólki ella veiðufari. Meirilutin

heldur, at landsstýrið skal áseta nærri løgfrøðisligar reglur um, at søluprísurin av slíkari veiðu verður býttur við 1/5 til veiðufar og manning, 2/5 til Grunnin fyri óarbeiðsførar fiskimenn og 2/5 til arbeiðsloysisskipanina.

Í samband við, at § 10 fevnir um reglur, sum seta forboð fyri virking (fabrik) umborð á fiskiskipum á føroyskum sjóøki, hevur landsstýrið eisini mælt til, at nevnda bann somuleiðis umfatar handfaring av veiðu og veiðuvørum. Av tí at ein ávís handfaring altíð eigur at fara fram, mælir meirilutin til, at orðið "handfaring" verður strikað. Vísandi til, at virking umborð, av kvoteraðum fiskasløgum, er bannað, heldur meirilutin, at orðið "veiðuvøra" er óneyðugt.

Stk. 6 í § 10 í uppskoti landsstýrisins er strikað. Meirilutin ásannar og tekur til eftirtektar, at skip undir føroyskum flaggi eru bundin at teimum millumlanda avtalum føroyingar eru partur av, og eiga slíkar avtalur altíð at verða hildnar frá føroyskari síðu. Hinvegin heldur meirilutin ikki, at føroyingar skulu leggja seg út í stríð, sum møguliga verður millum tveir partar, har annar parturin møguliga hevur framt brot á ásetingar ella reguleringar av fiskastovni, sum hin parturin hevur ásett.

ad. kap. 3
Tær broytingarnar, sum meirilutin mælir til at gera í kap. 3, t. v. s. frá § 12 til og við § 22, hava til endamáls at taka handilselementið burtur, men kortini at varðveita møguleikan fyri, at kvotur í ávísan mun kunnu umsetast.

Orsøkin til, at meirilutin mælir til at taka handilselementið burtur, er tann, at meirilutin heldur tað vera óheppið, um vit koma í tá støðu, at einstaklingar og/ella feløg, sum ikki eiga skip, koma at eiga kvotur, og at skip við veiðu og fiskiloyvi koma at liggja við ongari kvotu. Meirilutin hugsar her um tær avleiðingar, ið tær umsitiligu handilskvoturnar hava havt við sær í t. d. New Zealandi, Íslandi og Noregi, har bæði innlendskir og útlendskir kvotakeyparar hava sett seg á kvotapartar. Hóast tær av landsstýrinum tilmæltu reglur um eigaraviðurskifti, so sær meirilutin ein stóran vanda fyri, at vit fáa ávíst strámannavirksemi, og m. a. mælir meirilutin til at taka handilselementið burtur.

Í § 12 mælir meirilutin til, at í einum kvotaári kann eitt skip lata øðrum kvotuna, tó í mesta lagi fyri eitt ár í senn. Hetta merkir, at tá eitt nýtt kvotaár byrjar, fellur kvotan aftur til tað skipið, sum ráddi yvir kvotuni árið frammanundan. Um kvotarætturin verður latin í tvey samfull ár á rað, fellur viðkomandi kvotapartur aftur til felagskvotuna hjá viðkomandi høvuðsskipabólki, og kemur soleiðis øllum skipunum í bólkinum til góðar. Tá skip ynskja at fáa flutt kvotu við býti ella leigu, skal hetta fráboðast og góðkennast av landsstýrinum.

Vísandi til, at meirilutin er samdur um, at kvoturnar verða knýttar at veiðu- og fiskiloyvinum, verða reglurnar í § 17 um, at kvotarættindini ikki kunnu arvast, óneyðugar, og tí mælir meirilutin til, at henda grein verður strikað. §§ frá 18 til 50 verða tí broyttar til §§ 17 til 49.

ad. kap. 4
Tær broytingar, sum meirilutin mælir til í hesum kap., føra við sær, at tað verður løgtingið og ikki landsstýrið, ið ásetir heildarkvoturnar fyri hvønn fiskastovn fyri eitt ár í senn og ikki fyri 5 ár, sum landsstýrið hevur skotið upp. Eftir tilmæli frá Fiskirannsóknarstovuni og Stovnsrøktarnevndini skal landsstýrið leggja uppskot fyri løgtingið, soleiðis at løgtingið kann

avgreiða málið 10. aug. í tí ári, kvotaskeiðið byrjar. Hetta forðar ikki fyri, at tilmælini byggja á stovnsmetingar fyri eitt 5 ára skeið.

Í hesum kap. mælir meirilutin eisini til, at kvotaárið kemur at fevna um tíðarskeiðið frá 1. september til 31. august. Meirilutin vísir á, at fleiri onnur lond byrja nýtt kvotaár 1. januar, við tí úrslitið, at sera nógvur fiskur kemur á marknaðin tá. Hetta kann hava ávirkan á prísirnar. Somuleiðis byrja kvotaárini hjá føroyskum skipum, sum veiða í fremmandum sjógvi, nærum altíð 1. januar, og tí er tað neyðugt hjá landsstýrinum at hava hetta í huga, tá fiskiveiðuavtalur verða gjørdar við onnur lond. Eisini heldur meirilutin, at tað verður lættari hjá skipunum at leggja til rættis veiðu eftir øðrum fiskasløgum á óvanligum leiðum, tá botnfiskakvoturnar, í einum kvotaári, sum byrjar 1. sept., helst verða liðugt veiddar út á várið, og verður tá møguligt at gera alternativar royndir í summarmánaðunum.

Meirilutin mælir til, at fyrstu ferð verða heildarkvoturnar ásettar fyri 18 mánaðar, soleiðis at fyrsta skeiðið fevnir um tíðarskeiðið frá 1. mars til 31. august 1994, og næsta skeiðið fevnir um tíðarskeiðið frá 1. september 1994 til 31. august 1995.

ad. kap. 7

Í § 27 er broytingin tann, at kvotuskeiðið verður ásett fyri eitt ár í senn. Tó mælir meirilutin til, at fyrstu ferð verða heildarkvoturnar ásettar fyri 18 mánaðir, soleiðis at fyrsta skeiðið fevnir um tíðarskeiðið frá 1. mars til 31. august 1994, og næsta skeiðið fevnir um tíðarskeiðið frá 1. september 1994 til 31. august 1995. Somuleiðis mælir meirilutin til, at heildarkvotur verða ásettar fyri tosk á landgrunninum, tosk á Føroya Banka, hýsu, upsa og kongafisk. Í mun til landsstýrisuppskotið merkir hetta, at heildarkvota ikki verður ásett fyri longu, við teirri grundgeving, at hendan saman við brosmuni er alternativið hjá línuveiðuni á djúpum vatni.

Heildarkvoturnar, ið meirilutin mælir til at áseta eru hægri fyri tosk og hýsu á landgrunninum enn tær eru í uppskoti landsstýrisins. Meirilutin ásannar, at tað fer at verða trupult at veiða hini fiskasløgini um toska og hýsu MLV-ið er so lágt sum uppskot landsstýrisins. Tá ið meirilutin torir at hækka MLV-ið fyri hesi fiskasløg, er tað við teirri treyt, at so stórur partur av grunninum er friðaður fyri trolveiði.

Meirilutin heldur, at veiðubann framvegis eigur at verða galdandi á Føroya Banka, men at útróðrarfør við snellu og línu og stállínuskip eins og higartil, kunnu fáa loyvi til royndarfiskiskap við ávísari toskakvotu, ið samanlagt ikki má fara upp um heildarkvotuna av toski, sum er ásett fyri Føroya Banka. Meirilutin gongur út frá, at útróðrarfør, sum ikki hava Íslandsloyvi ella annað serloyvi, fáa bankaloyvi fram um onnur.

Í samband við býtið av heildarkvotuni í § 27 fyri ávís fiskasløg millum veiðuhættir og skipabólkar, kann meirilutin sum heild taka undir við uppskoti landsstýrisins, men mælir tó til at, lemmatrolarar og partrolarar verða koyrdir í hvør sín bólk, og verður heildarkvotan tí at býta millum 6 bólkar. Orsøkin til hesa broyting er, at lemmatrolararnir, sum í stóran mun eru djúpvatnstrolarar, í høvuðsheitinum veiða burtur av kongafiskakvotuni, meðan partrolararnir veiða burtur av upsakvotuni, og tí verður torført at hava hesar í sama bólki, tá kvotan skal býtast.

Í § 29 er sett nýtt stk. 3. Meirilutin heldur, at um ein bólkur av veiðiflotanum ikki klárar at

fiska sítt MLV, sum honum er tillutað, verður landsstýrinum heimilað at flyta hesar ónýttu kvotu til annan bólk sum tørvar hesa kvotu, býtt eftir áseingunum í lógini.

Í grein 30, stk. 2., hevur landsstýrið skotið upp, at útróðrarfør, størri enn 20 BRT, kunnu velja ímillum at veiða burtur av felagskvotu ella at fáa egnan kvotapart, ið síðan verður tillutaður út frá søguligum tølum. Meirilutin tekur ikki undir við hesum og heldur, at ein slík skipan verður til bága fyri teir, sum reka veruligan útróður, og mælir tí til, at hesin skipabólkur skal veiða burtur av eini felagskvotu. Hetta merkir, at kvotur ikki kunnu umsetast í hesum skipabólki, eins og hjá útróðraførum undir 20 BRT.

ad. kap. 10
Í §§ 41 og 42 verða tvær broytingar, sum landsstýrið hevur biðið um at fáa við. Í § 41 stendur í uppskoti landsstýrisins, at sektarpeningur fer í grunn, men tá tað fyriliggur ein avtala millum ríkisstjórnina og landsstýrið um býti av sektarpeningi, verður greinin at broyta soleiðis, at sektarpeningurin verður býttur eftir galdandi avtalu millum ríkisstýrið og landsstýrið.

Í § 42, stk. 3 í uppskoti landsstýrisins stendur, at brot á lógina ella reglur, ásettar við heimild í lógini, kunnu verða avgjørd av løgregluni eins væl og av skiparanum á avvarðandi fiskieftirlitsskipi. Her skal skoytast uppí "í samráð við fútan".

Við hesum broytingum mælir meirilutin (Heini O. Heinesen, Jógvan Adolf Johannessen, Henrik Old og Karl Heri Joensen) í staðin fyri uppskot landsstýrisins at samtykkja niðanfyri standandi lógaruppskot og setir fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

Kapittul 1

Lógarøki, endamál og allýsingar v.m.

§ 1. Lógin fevnir um vinnuligt at gagnnýta livandi tilfeingi á føroysku landleiðunum og hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi á sjóleiðum uttan fyri føroysku landleiðirnar. Lógin fevnir ikki um at gagnnýta hval, kóp, fugl og alifisk.

§ 2. Livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum og tey rættindi, føroyska heimastýrið við samráðingum hevur rokkið ella

lagtingslov om erhvervsmæssigt fiskeri.

Kapitel 1

Lovens område, formål og definitioner m.v.

§ 1. Loven omfatter erhvervsmæssig udnyttelse af de levende ressourcer på det færøske fiskeriterritorium og for fiskefartøjer under færøsk flag på havområder udenfor det færøske fiskeriterritorium. Loven omfatter ikke udnyttelse af hvaler, sæler, fugle og opdrætsfisk.

§ 2. De levende ressourcer på det færøske fiskeriterritorium og de rettigheder, det færøske hjemmestyre ved forhandlinger

eftir altjóða rætti eigur uttan fyri føroysku landleiðirnar, eru ogn Føroya fólks. Dentur verður lagdur á, í umsitingini av hesi lóg, at varðveita tilfeingið og at troyta og gagnnýta hetta burðardygt á skilabesta hátt. lívfrøðiliga og búskaparliga, við virðing fyri sambandinum millum ymisku dýra- og plantustovnarnar í havinum og meingi teirra, til tess at tryggja besta samfelagsbúskaparliga ídkastið frá fiskivinnuni, støðugar arbeiðs- og inntøkumøguleikar og møgulcikar fyri vinnuligum virksemi um alt landið.

Stk. 2. Viðvíkjandi stovnum, sum ferðast um fiskimark ella bert ferðast í altjóðasjógvi, verður dentur lagdur á millumlandasamstarv í samljóð við altjóða havrættin og á at samstarva við onnur lond um skipan fyri fiskiskapi á ávisunu havleiðum og eftir ávísum fiskasløgum, fyri at tryggja somu endamál, sum nevnd eru í stk. 1 í hesi grein.

Stk. 3. Ein meginregla í umsitingini av tilfeingi, ið ikki er avmarkað av altjóða- ella øðrum avtalum, sum Føroyar eru partur í, er at veita so frælsa atgongd til hetta tilfeingi sum gjørligt fyri fiskifør undir føroyskum flaggi.

Stk. 4. Landsstýrið kann seta nevnd, mannað við fiski- og útróðrarmonnum, fiskifrøðingum og fiskivinnubúskaparfrøðingum at hava umsjón við, at endamálsorðingarnar í hesi grein vera fylgdar og gera tilmæli til landsstýrið um møgulig stig, sum stuðla upp undir, at endamálini verða rokkin.

§ 3. Rættindi til fiskiskap sambært hesi lóg fevna um veiðu við fiskiførum undir føroyskum flaggi eftir dýrum og plantum á føroysku landleiðunum og á havleiðum uttan fyri føroyskt fiskimark, og við fiskiførum undir fremmandum flaggi á føroysku landleiðunum.

Stk. 2. Fiskirættindi latin sambært hesi lóg veita ikki einstøkum bólkum ella einstaklingum ognarrætt. Somuleiðis kunnu rætt-

eller efter international ret besidder udenfor det færøesk fiskeriterritorium, er det færøske folks ejendom. Der lægges vægt på ved administrationen af denne lov at bevare ressourcerne og at udnytte disse bæredygtigt på bedste måde, biologisk og økonomisk med respekt for sammenhængen mellem de forskellige dyre- og plantebestande i havet og mængden af disse, for at sikre det bedst mulige bidrag til samfundsøkonomien fra fiskerierhvervet, stabile arbejds- og indtægtsmuligheder og muligheder for økonomisk virksomhed over hele landet.

Stk. 2. For bestande, der færdes på tværs af fiskerigrænser eller kun lever i internationalt farvand, lægges vægt på internationalt samarbejde i overensstemmelse med den internationale havret og på samarbejde med andre lande om organisering af fiskeriet inden for bestemte havområder og efter bestemte fiskearter, for at sikre de samme formål, der er nævnt i stk. 1 i denne paragraf.

Stk. 3. En hovedregel i administrationen af ressourcerne, som ikke er begrænset af internationale- eller andre aftaler, som Færøerne deltager i, er at give så fri adgang til disse ressourcer som muligt for fiskeskibe under færøsk flag.

Stk. 4. Landsstyret kan nedsætte et udvalg, bestående af fiskere, fiskeribiologer og fiskeriøkonomer til at sikre, at formålserklæringerne i denne paragraf bliver fulgt, og afgive indstilling til landsstyret om eventuelle foranstaltninger, der støtter formålenes opfyldelse.

§ 3. Rettigheder til fiskeri ifølge denne lov omfatter fiskeri med fiskefartøjer under færøsk flag efter dyr og planter på det færøske fiskeriterritorium og på havområder udenfor det færøske fiskeriterritorium, og med fiskefartøjer under fremmed flag på det færøske fiskeriterritorium.

Stk. 2. Fiskerirettigheder i henhold til denne lov tildeler ikke enkelte grupper eller enkelte personer ejendomsret. Lige-

indi til fiskiskap takast aftur uttan endurgjaldsskyldu.

§ 4. Føroyska ytra landleiðin er sjógvurin innanfyri linju, sum gongur 200 fjóðringar (1 fjórðingur = 1852 metrar) frá beinum grundlinjum drignar gjøgnum hesi 12 støðini í tilskilaðu raðfylgjuni:

1. Sker í útsynning úr Munkinum.
   61°20'19''306 N,
   6°40'06''790 W
2. Vestasti endi á Knúpi út fyri Fámará.
   61°28'34''772 N,
   6°52'18''834 W.
3. Vestasta skerið út fyri Mykines vita.
   62°05'46''439 N,
   7°41'25''623 W.
4. Útnyrðingsendi á skeri í útnyrðing úr Mykines vita.
   62°05'52''783 N,
   7°41'12''936 W.
5. Útnyringsendi á skeri í útnyrðing úr Mýlingi (skeiðið).
   62°18'19''856 N,
   7°12'59''409 W.
6. Útnyrðingsendi á Kallsfles norður úr Kalli.
   62°22'26''968 N,
   6°48'18''806 W.
7. Sker norður úr Ennibergi.
   62°23'49''299 N,
   6°33'38''438 W.
8. Skoparin undir Norðbergi á Fugloynni.
   62°21'16''163 N,
   6°17'59''058 W.
9. Landnyrðingshornið á Fugloynni.
   62°20'40''637 N,
   6°15'16''003 W.
10. Eystasta hornið á Bispinum eystanfyri Fugloynna.
    62°20'27''398 N,
    6°15'00''521 W.
11. Eystasti endi á Munkaflesjunum.
    61°20'30''124 N.
    6°39'30''108 W.
12. Sunnasti endi á Stórufles við Munkin.

leides kan rettigheder til fiskeri inddrages.

§ 4. Det ydre færøske fiskeriterritorium er farvandet inden for en linie, der går 200 sømil (1 sømil = 1852 meter) fra lige basislinjer, der trækkes gennem disse 12 punkter i følgende rækkefølge:

1. Skær sydvest for Munkurin.
   61°20'19''306 N,
   6°40'06''790 W.
2. Vestenden på Knúpur ud for Fámará.
   61°28'34''772 N,
   6°52'18''834 W.
3. Det vestligeste skær ud for Mykines fyr.
   62°05'46''439 N,
   7°41'25''623 W.
4. Nordvestenden af skær nordvest for Mykines fyr.
   62°05'52''783 N,
   7°41'12''936 W.
5. Nordvestenden af skær nordvest for Mýling. (Skeiðið)
   62°18'19''856 N,
   7°12'59''409 W.
6. Nordvestenden af Kallsfles nord for Kallur.
   62°22'26''968 N.
   6°48'18''806 W.
7. Skær nord for Enniberg.
   62°23'49''299 N,
   6°33'38''438 W.
8. Skoparin undir Norðberg på Fugloy.
   62°21'16''163 N,
   6°17'59''058 W.
9. Nordøsthjørnet på Fugloy.
   62°20'40''637 N.
   6°15'16''003 W.
10. Østhjørnet på Bispurin øst for Fugloy.
    62°20'27''398 N,
    6°15'00''521 W.
11. Østenden på Munkaflesjunum.
    61°20'30''124 N,
    6°39'30''108 W.
12. Sydenden på Stórafles ved Munkurin.

61°20'26''953 N,
6°39'33''711 W.

Koordinatini frammanfyri vísa til European Datum (1. revisión 1950).

Stk. 2. Har minni enn 400 fjórðingar eru úr strondum Føroya til strendur Íslands, Noregs og Stórabretlands verður fiskimarkið, um serstøk avtala ikki er gjørd avmarkað eftir tí linju, ið allastaðni liggur eins langt frá næsta punkti á grundlinjunum við nevndu strendur (miðlinjan).

Stk. 3. Innara landleiðin er sjógvurin innanfyri beinar grundlinjur drignar gjøgnum hesi 12 støðini í tilskilaðu raðfylgjuni:

1) Sker í útsynning úr Munkinum.
61°20'19''306 N.
06°40'06''790 W.
2) Vestasti endi á Knúpi út fyri Fámará.
61°28'34''772 W,
06°52'18''834 W.
3) Vestasta skerið út fyri Mykines vita.
62°05'46''439 N,
07°41'25''623 W.
4. Útnyrðingsendi á skeri í útnyrðing úr Mykines vita
62°05'52''783 N,
07°41'12''936 W.
5) Útnyrðingsendi á skeri í útnyrðing úr Mýlingi (Skeiðið).
62°18'19''856 N,
07°12'59''409 W.
6) Útnyrðingsendi á Kallsfles norður úr Kalli.
62°22'26''968 N,
06°48'18''806 W.
7) Sker norður úr Enniberg.
62°23'49''299 N,
06°33'38''438 W.
8) Skoparin undir Norðbergi á Fugloynni.
62°21'16''163 N,
06°17'59''058 W.
9) Landnyrðingshornið á Fugloynni.
62°20'40''637 N,
06°15'16''003 W.
10) Eystasta Hornið á Bispinum eystanfyri Fugloynna.
62°20'27''398 N,

61°20'26''953 N,
6°39'33''711 W.

Koordinaterne ovenfor henviser til European Datum (1. revision 1950).

Stk. 2. Hvor afstanden er mindre end 400 sømil fra Førøerne til Islands, Norges og Storbritaniens kyster, skabes afgrænsingen af fiskeriterritoriet, hvis særlig aftale ikke er indgået, efter den linie, der overalt ligger lige langt fra næste punkt på basislinjerne ved de pågældende kyster (midtlinien).

Stk. 3. Det indre fiskeriterritorium er farvandet indenfor lige basislinjer der trækkes gennem disse 12 punkter i den angivne rækkefølge:

1) Skær sydvest for Munkurin.
61°20'19''306 N.
06°40'06''790 W.
2) Vestligste ende på Knúpur ud for Fámará.
61°28'34''772 W.
06°52'18''834 W.
3) Vestligste skær ud for Mykines fyr.
62°05'46''439 N,
07°41'25''623 W.
4) Nordvestenden af skær nordvest for Mykines fyr.
62°05'52''783 N.
07°41'12''936 W.
5) Nordvestenden af skær nordvest for Mýling (Skeiðið).
62°18'19''856 N.
07°12'59''409 W.
6) Nordvestenden på Kallsfles nord for Kallur.
62°22'26''968 N.
06°48'18''806 W.
7) Skær nord for Enniberg.
62°23'49''299 N,
06°33'38''438 W.
8) Skoparin under Norðberg på Fugloy.
62°21'16''163 N.
06°17'59''058 W.
9) Nordøsthjørnet på Fugloy.
62°20'40''637 N.
06°15'16''003 W.
10) Østligste hjørne på Bispurin øst for

06°15'00''521 W.

11) Eystasti endi á Munkaflesjunum
61°20'30''124 N.
06°39'30''108 W.

12) Sunnasti endi á Stórufles
61°20'26''953 N.
06°39'33''711 W.

Koordinatini frammanfyri vísa til European Datum (1. revisión 1950).

Stk. 4. Havleiðirnar uttan fyri føroysku landleiðirnar eru

1) NEAFC skipanarøkið, NAFO skipanarøkið og NASCO skipanarøkið og tær altjóðaleiðir, har Føroyska heimastýrið ikki hevur góðkent avtalur um skipan av fiskiskapi.
2) búskaparøkini hjá Kanada, Grønlandi, Íslandi, Noregi, Russlandi, Estlandi, Lettlandi, Litavia og Europeiska samveldinum og øðrum londum, sum Føroyar hava sínámillum fiskivinnuavtalur við.

§ 5. Mest loyvda veiða (MLV) sambært hesi lóg er tað tal og/ella tann nøgd í tonsum, rund vekt, av fiski og dýrasløgum, sum veiðast kann í einum fiskiári úr ávísum fiskastovni á føroysku landleiðunum. Við MLV sum grundarlag verður kvota ásett fyri hvønn fiskastovn sær.

Stk. 2. Heildarkvota sambært hesi lóg er tann nøgd av fiski í tonsum, rund vekt,

1) loyvt verður fiskiførum undir føroyskum flaggi at veiða í einum fiskiári úr ávísum fiskastovni á føroysku landleiðunum,
2) fiskifør undir føroyskum flaggi hava rættindi at veiða sambært árligum semjum í millumlandafiskivinnunevndum og sambært árligum avtalum eftir sínámillum fiskivinnusáttmálum við onnur lond.

Stk. 3. Veiðuloyvi sambært hesi lóg er góðkenning, ið Føroya Landstýri veitir ávísum fiskifari at veiða á føroysku land-

Fugloy.

62°20'27''398 N.
06°15'00''521 W.

11) Østligste ende af Munkaflesjunum.
61°20'30''124 N.
06°39'30''108 W.

12) Sydligste ende på Stórafles ved Munkurin.
61°20'26''953 N.
06°39'33''711 W.

Koordinaterne overfor henviser til European Datum (1. revision 1950).

Stk. 4. Havområderne udenfor de færøske fiskeriterritorier er

1) NEAFC området, NAFO området og NASCO området og de internationale havområder, hvor det færøske hjemmestyre ikke har godkendt aftaler om fiskeri.
2) Canadas, Grønlands, Islands, Norges, Ruslands, Estlands, Letlands, Litaviens og Den Europæiske Unions økonomiske zoner og de økonomiske zoner i andre lande, som Færøerne har bilaterale fiskeriaftaler med.

§ 5. Højst tilladte fangst (HTF) i henhold til denne lov er det tal og/eller den mængde i tons, rund vægt, af fisk og dyrebestande, som fanges kan i et fiskeriår af en bestemt fiskebestand på det færøske fiskeriterritorium. Med HTF som grundlag bliver kvote fastsat for hver fiskebestand.

Stk. 2. Totalkvote ifølge denne lov er den mængde fisk i tons, rund vægt, som

1) der tillades fiskefartøjer under færøsk flag at fange i et fiskeriår af en bestemt fiskebestand på det færøske fiskeriterritorium,
2) fiskefartøjer under færøsk flag har fået tildelt ret til at fange i henhold til årlige overenskomster i internationale fiskerikommissioner og i henhold til de årlige aftaler ifølge bilaterale fiskeriaftaler med andre lande.

Stk. 3. Fangsttilladelse i henhold til denne lov er den godkendelse, som Færøernes

leiðunum og á leiðum uttanfyri føroysku landleiðirnar. Veiðuloyvi verður útskrivað fyri eitt ár í senn.

Stk. 4. Fiskiloyvi sambært hesi lóg er tann rættur, sum Føroya Landsstýri hevur latið eigara av ávísum fiskifari, sum hevur veiðuloyvi sambært stk. 3, at veiða ávísa nøgd úr fiskastovnum á ávísum leiðum í ávísum fiskiári.

Stk. 5. Felags kvotupartur, roknaður út eftir reglunum í §§ 28-29, er tann prosentpartur av heildarkvotuni av ávísum fiskastovni, ið settur verður av til at fiska hjá einum bólki av fiskiførum, undir einum. Felags árskvota er felags kvotuparturin roknaður um til tons, rund vekt, av fiski.

Stk. 6. Egin kvotupartur, roknaður út eftir reglunum í §§ 28-29, er tann prosentpartur av felags árskvotu av ávísum fiskastovni, ið latin verður fiskifari undir føroyskum flaggi. Egin árskvota er egni kvotuparturin roknaður um til tons, rund vekt, av fiski.

Stk. 7. Hjáveiðukvota er kvotupartur, sum verður lutaður fiskiførum ella bólkum av fiskiførum til, aftrat egnari árskvotu ella felags árskvotu av høvuðssløgunum, sum fiskifarið ella bólkurin av fiskiførum royndir eftir.

Stk. 8. Fiskiveiðueftirlitið er tann myndugleiki, sum landsstýrið leggur eftirlit við hesi lóg til.

Stk. 9. Stovnsrøktarnevndin. Landsstýrið velur stovnsrøktarnevnd. Fiskiveiðufeløgini umboðandi trol- og húkaveiðu hava hvør sínar tveir limir og tiltakslimir í stovnsrøktarnevnd, sum gevur landsstýrinum sítt tilmæli um mest loyvdu veiði. Nevndin verður vald fyri 4 ár í senn. Landsstýrið ger reglugerð um fyriskipan av hesum vali og tryggjar nevndini kunnleika til tey tilmæli, ið Fiskirannsóknarstovan letur landsstýrinum. Fiskirannsóknarstovan tilnevnir skrivara í stovnsrøktarnevndina.

landsstyre tildeler et bestemt fiskefartøj til fangst på det færøske fiskeriterritorium og i havområder udenfor det færøske fiskeriterritorium. Fangsttilladelsen udskrives for ét år ad gangen.

Stk. 4. Fiskeritilladelse i henhold til denne lov er den ret, som Færøernes landsstyre har givet ejeren af et bestemt fiskefartøj, som har fangsttilladelse i henhold til stk. 3, til at fiske en bestemt mængde af fiskebestande på bestemte områder i et bestemt fiskeriår.

Stk. 5. Fælles kvoteandel, udregnet efter reglerne i §§ 28-29, er den procentdel af totalkvoten af en bestemt fiskebestand, som afsat er til fiskeri af en særlig angivet gruppe fiskefartøjer under et. Fælles årskvote er fælles kvoteandelen omregnet til tons, rund vægt, fisk.

Stk. 6. Individuel kvoteandel, udregnet efter reglerne i §§ 28-29, er den procentdel af en fælles årskvote af en bestem fiskebestand, som tildeles fiskefartøj under færøsk flag. Individuel årskvote er den individuelle kvoteandel omregnet til tons, rund vægt, fisk.

Stk. 7. Bifangstkvote er en kvoteandel, der tildeles fiskefartøjer eller grupper af fiskefartøjer, i tillæg til egen årskvote eller fælles årskvote af hovedsorterne, som fiskefartøjet eller gruppen af fiskefartøjer driver fiskeri efter.

Stk. 8. Fiskerikontrollen er den myndighed til hvilken landsstyret lægger tilsynet med denne lov.

Stk. 9. Stovnsrøktarnevndin. Landsstyret vælger "stovnsrøktarnevnd". Fiskeriforeningerne repræsenterende trawl- og krogfiskeri har hver to medlemmer og suppleanter i "stovnsrøktarnevnd", som afgiver indstilling til landsstyret om højst tilladte fangst. Udvalget vælges for fire år ad gangen. Landsstyret udfærdiger reglement om afholdelse af dette valg og tilsikrer udvalget kundskab til de indstillinger, som Fiskirannsóknarstovan giver landsstyret. Fiskirannsóknarstovan udnævner sekretær til "stovnsrøktarnevndi-

§ 6. Tann, ið ætlar sær at avrciða, skal søkja um veiðu- og fiskiloyvi. Um hert verður veitt til húsbrúks, krevst ikki veiðuella fiskiloyvi.

Kapittul 2
Almennar reglur fyri fiskiskapi

§ 7. Vinnuligur fiskiskapur sambært hesi lóg kann bert fara fram við fiskiførum, sum sambært ognarviðurskiftunum eru heimaboyrandi í Føroyum og hava veiðuloyvi eftir § 5, stk. 3. Fyri at eiga fiskifar undir føroyskum flaggi krevst, at eigararnir eru:

1) Einkultpersónar, einkultpersónar í felagsskapi, sum hefta persónligt, solidariskt og beinleiðis og sum lúka treytirnar í stk. 2,
2) ella feløg, sum lúka treytirnar í stk. 3.

Stk. 2. Eigararnir sambært stk. 1 skulu hava fast tilknýti til Føroyar, allir skulu vera skrásettir í fólkayvirlitinum seinastu 2 árini, og allir skulu vera fult skattskyldugir í Føroyum.

Stk. 3. Um eigararnir sambært stk. 2 eru skipaðir í felagi, skal tað lúka fylgjandi treytir:

1) Felagið skal vera partafelag, smápartafelag, lutafelag ella partsreiðarí. Er talan um partafelag ella smápartafelag skulu partabrøvini vera navnapartabrøv.
2) Av eigarunum skulu í minsta lagi meirilutin lúka treytirnar í stk. 2.
3) Føroya landsstýri skal hava upplýsingar um hesi viðurskifti og skal góðkenna broytingar í ognarviðurskiftunum.
4) Landsstýrið kann í heilt serstøkum førum gera undantøk viðvíkjandi treytunum sambært hesi grein.

Stk. 4. Persónar og feløg, sum hava rikið fiskifør í 1993 og undan, kunnu halda áfram við virksemi sínum hóast áseting-

na".

§ 6. Den, der vil indhandle, skal søge om fangst- og fiskeritilladelse. Fangst til husholdningsbrug fordrer ikke fangst- eller fiskeritilladelse.

Kapitel 2
Almindelige regler for fiskeriet

§ 7. Erhvervsmæssigt fiskeri i henhold til denne lov kan kun drives med fiskefartøjer, som ifølge ejerforholdene er hjemmehørende på Færøerne og har fangsttilladelse jfr. § 5, stk. 3. For at kunne eje et fiskefartøj under færøsk flag kræves, at ejerne er:

1) Enkeltpersoner, enkeltpersoner i selskabsform, der hæfter personligt, solidarisk og direkte og som opfylder betingelserne i stk. 2,
2) eller selskaber, der opfylder betingelserne i stk. 3.

Stk. 2. Ejerne i henhold til stk. 1 skal have fast tilknytning til Færøerne, alle skal have været registrerede i folkeregisteret på Færøerne de seneste 2 år, og alle skal være fuldt skattepligtige på Færøerne.

Stk. 3. Hvis ejerne i henhold til stk. 2 er organiserede i selskabsform, skal dette opfylde følgende betingelser:

1) Selskabet skal være et aktieselskab, anpartsselskab, andelsselskab eller partsrederi. Er der tale om aktieselskab eller anpartsselskab, skal aktierne være noterede på navn.
2) Et flertal af ejerne skal opfylde betingelserne i henhold til stk. 2.
3) Færøernes Landsstyre skal have oplysninger om disse forhold og skal godkende ændringer i ejerforholdene.
4) Landsstyret kan i helt særlige tilfælde gøre undtagelse fra betingelserne i henhold til denne paragraf.

Stk. 4. Personer og selskaber, der har drevet fiskefartøjer i 1993 og inden da, kan fortsætte sin virksomhed trods be-

amar í stk. 1-3, treytað av, at tey fiskifør. tey hava rikið, hava fingið veiðuloyvi frá landsstýrinum fyri árið 1993.

§ 8. Bert persónar og feløg, ið eiga fiskifør, ið hava veiðuloyvi sambært § 5, stk. 3 kunnu fáa rættindi sambært § 5, stk. 4-7.
Stk. 2. Verður fiskifar við veiðuloyvi lagt med alla, er ræðisavmarking skrásett í skipaskránni ella farið er strikað í skipaskránni, kann landsstýrið eftir umsókn loyva, at veiðuloyvið verður flutt til annað fiskifar, sum er í flotanum frammanundan.
Stk. 3. Veiðiloyvi frá fiskifari, ið er lagt med alla, har ræðisavmarking er skrásett í skipaskránni, ella farið er strikað í skipaskránni, kann verða flutt til innflutt fiskifar við somu ella minni orku og sum ikki er eldri enn 10 ár.

§ 9. Landsstýrinum verður heimilað í kunngerð at skipa fyri fiskiskapi hjá fiskiførum undir føroyskum og fremmandum flaggi á føroysku landleiðunum og fiskiskapi hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi uttanfyri landleiðirnar og kann landsstýrið m.a. gera reglur um:

1) Heildarkvota fyri ávísar fiskastovnar.
2) Býti av felags árskvotum, sum ikki verða skiftar í egnar árskvotur, eftir fiskiføð, har henda lóg ikki ásetur býtið.
3) Skyldu at lata veiðufráboðan til eftirlitsendamál.
4) Skipan við veiðu- og fiskiloyvum og avgreiðslugjald í hesum sambandi.
5) Vernd av ungfiski og hámark fyri íblanding av ungfiski.
6) Bann fyri at blaka veiði út aftur, og hvørji dýra- og plantusløg koma undir hetta bann.
7) Hvussu mótroknað verður, um veitt verður út um kvotuna.

Stk. 2. Landsstýrinum verður heimilað saman við løgtingsins fiskivinnunevnd við

stemmelserne i stk. 1-3, på betingelse af, at de fiskefartøjer, de har drevet, har fået fangsttilladelse fra landsstyret for året 1993.

§ 8. Kun personer og selskaber, der ejer fiskefartøjer, der har fangsttilladelse i henhold til § 5, stk. 3, kan få rettigheder i henhold til § 5, stk. 4-7.
Stk. 2. Oplægges fiskefartøj med fangsttilladelse permanent, er en rådighedsbegrænsning registreret i skibsregisteret, eller fartøjet er slettet i skibsregisteret, kan landsstyret efter ansøgning tillade, at fangsttilladelsen flyttes til andet fiskefartøj, som i forvejen er i den færøske fiskeflåde.
Stk. 3. Fangsttilladelse fra fiskefartøj, der er oplagt permanent, hvor en rådighedsbegrænsning er registreret i skibsregisteret, eller fartøjet er slettet i skibsregisteret, kan flyttes til andet fiskefartøj med samme eller mindre kapacitet, og som ikke er ældre end 10 år.

§ 9. Landsstyret bemyndiges til i bekendtgørelse at regulere fiskeriet for fiskefartøjer under færøsk og fremmed flag på det færøske fiskeriterritorium og fiskeri for fiskefartøjer under færøsk flag udenfor fiskeriterritoriet og kan bl.a. udstede regler for:

1) Totalkvoter for bestemte fiskebestande.
2) Fordelingen af fælles årskvoter, der ikke fordeles som egne årskvoter, efter fiskeriperiode, hvor denne lov fastsætter fordelingen.
3) Pligt til at indlevere fangstrapport til kontrolformål.
4) Ordning vedrørende fangst- og fiskeritilladelser og ekspeditionsgebyr i forbindelse hermed.
5) Beskyttelse af ungfisk og øvregrænse for, hvor stor en del ungfisken kan udgøre fangstmængden.
6) Forbud mod at kaste fangst i havet, og hvilke dyre- og plantearter der omfattes af dette forbud.

kunngerð at áseta reglur um, hvussu fiskiskapurin skal fara fram, reglur um minstamát, friðað øki, friðingartíðir, fiskireiðskap og nýtslu hansara og veiðihættir.

Stk. 3. Landsstýrinum er somuleiðis heimilað at skipa fyri fiskiskapi frá landi og í áum, vøtnum og løkum og í kunngerð áseta nærri reglur um minstamát, friðað øki, friðingartíðir, fiskireiðskap og nýtslu teirra, fiskihættir, avmarking av veiðinøgd, veiðiorku og onnur tiltøk.

§ 10. Virking av veiðu úr fiskastovnum, sum eru undir kvotu, umborð á fiskiførum undir føroyskum flaggi á føroysku landleiðunum er bannað.

Stk. 2. Virking av veiðu á føroysku landleiðunum umborð á fiskiførum undir fremmandum flaggi kann bert fara fram við landsstýrisins loyvi.

Stk. 3. Umskiping av veiðu frá fiskiførum undir føroyskum flaggi til fiskifør við tilvirkingarloyvi ella til fiskifør undir fremmandum flaggi kann bert fara fram við landsstýrisins loyvi.

Stk. 4. Tað er ikki loyvt at blaka veiðu fyri borð.

Stk. 5. Á landleiðunum er tað bannað fiskiførum, sum eru undir fremmandum flaggi og fremmandum ríkisborgarum at reka vinnuligan fiskiskap yvirhøvur, herundir fáast við slíkt, ið stendur í samband við fiskiskap, so sum uppskiping og avreiðing av fongi, umskiping, virking, pakking ella onnur handfaring av fiski ella fiskavøru, umskiping av útgerð ella ankring við tí í hyggju at taka lut í umskiping av fiski ella taka inn útgerð.

Stk. 6. Landsstýrinum er heimilað at gera undantak frá forboðnum í stk. 5.

§ 11. Fiskifør undir føroyskum flaggi

7) Modregning i tilfælde af kvoteoverskridelse.

Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til sammen med lagtingets fiskeriudvalg ved bekendtgørelse at fastsætte regler om, hvordan fiskeriet skal foregå, regler om mindstemål, fredede områder, fredningstider, fiskeredskaber og deres benyttelse, samt fangstmetoder.

Stk. 3. Landsstyret har ligeledes hjemmel til at regulere fiskeri fra land og i åer, indsøer og bække, og kan i bekendtgørelse udstede nærmere regler om mindstemål, fredede områder, fredningstider, fiskeredskaber og deres benyttelse, fiskerimetoder, begrænsning af fangstmængde, fangstkapacitet og andre foranstaltninger.

§ 10. Forarbejdning af fangst af kvoterede fiskebestande ombord på fiskefartøjer under færøsk flag på færøsk fiskeriterritorium er forbudt.

Stk. 2. Forarbejdning af fangst færøsk fiskeriterritorium ombord på fiskeskibe under fremmed flag kan kun ske med landsstyrets tilladelse.

Stk. 3. Omladning af fangst fra fiskefartøjer under færøsk flag til fiskefartøjer med forarbejdningstilladelse eller til fiskefartøjer under fremmed flag kan kun ske med landsstyrets tilladelse.

Stk. 4. Det er ikke tilladt at kaste fangst over bord.

Stk. 5. Det er forbudt fiskeskibe under fremmed flag og fremmede statsborgere på fiskeriterritorium overhovedet at udføre erhvervsmæssigt fiskeri, herunder foretage sig noget, der har forbindelse med fiskeri, så som losning og indhandling af fangst, omladning, forarbejdning, pakning eller anden håndtering af fisk eller fiskeprodukt, omladning af udrustning eller opankring med den hensigt at deltage i omladning af fisk eller ombordtagning af udrustning.

Stk. 6. Landsstyret er bemyndiget til at dispensere fra forbudet i stk. 5.

§ 11. Fiskefartøjer under færøsk flag kan

kunnu ikki fara til vinnuligan fiskiskap á føroysku landleiðunum uttan at hava veiðuloyvi og fiskiloyvi sambært § 5, stk. 3 og 4.

Stk. 2. Til vinnuligan fiskiskap við fiskiførum undir føroyskum flaggi eftir fiskasløgum, ið koma undir heildarkvotu sambært § 5, stk. 2, krevst, umframt veiðuloyvi og fiskiloyvi, sum nevnt í stk. 1, ræði yvir kvotum, sambært § 5, stk. 5-7.

Stk. 3. Fiskiskapur við fiskiførum undir føroyskum flaggi uttanfyri føroysku landleiðirnar á havleiðunum nevndar í § 4, stk. 4 kann bert fara fram við loyvi frá Føroya landsstýri, og kann landsstýrið í loyvinum áseta nærri treytir fiskiskapinum viðvíkjandi.

Stk. 4. Fiskifør undir fremmandum flaggi kunnu bert veiða á føroysku landleiðunum við loyvi frá landsstýrinum, sambært sínámillum fiskiveiðuavtalur.

ikke påbegynde erhvervsmæssigt fiskeri på færøsk fiskeriterritorium uden fangsttilladelse og fiskeritilladelse ifølge § 5, stk. 3 og 4.

Stk. 2. Tii erhvervsmæssigt fiskeri med fiskefartøjer under færøsk flag efter fiskesorter, der kommer under totalkvote i henhold til § 5, stk. 2, kræves, udover fangsttilladelse og fiskeritilladelse, som nævnt i stk. 1, rådighed over kvoter i henhold til § 5, stk. 5-7.

Stk. 3. Fiskeri med fiskefartøjer under færøsk flag udenfor færøsk fiskeriterritorium på hovedområderne, der er nævnt i § 4, stk. 4, kan kun foregå med tilladelse fra Færøernes Landsstyre og Landsstyret kan i tilladelsen fastsætte nærmere betingelser vedrørende fiskeriet.

Stk. 4. Fiskefartøjer under fremmed flag kan kun fiske på færøsk fiskeriterritorium med Landsstyrets tilladelse i henhold til bilaterale fiskeriaftaler.

Kapittul 3
Reglur um kvoturættindi

§ 12. Skip við veiðuloyvi og fiskiloyvi hava rætt til kvotupart ella til at fiska av heildarkvotu.

§ 13. Eingin kann ráða yvir meira enn 10% av øllum heildarkvotunum á føroysku landleiðunum.

§ 14. Landsstýrinum er heimilað at áseta avgjald fyri kvoturættindi fyri hvørt fiskiár sær. Tá avgjaldsupphæddin verður asett skal mesti dentur leggjast á tilfeingisrentuna.

§ 15. Egin kvotupartur kann latast ella leigast til aðrar, um teir lúka treytirnar í lógini annars, við teimum avmarkingum, sum eru ásettar í stk. 2 og § 16. Landsstýrið skal hava fráboðan um flyting av kvotu, áðrenn farið verður út at fiska hesa. Kvotuparturin kann ikki setast í veð.
Stk. 2. Kvotur ella partur av kvotum kunnu ikki latast øðrum í meira enn 1 ár í senn. Verður kvota latin øðrum meira enn tvey fylgjandi ár, fellur hon til felagskvotuna hjá avvarðandi skipabóki.

§ 16. Við teimum avmarkingum, nevndar eru í § 15, eru kvotur frítt umsetiligar í einum kvotaári.
Stk. 2. Egnir kvotupartar, sum eru grundaðir á veiðu við útróðrarbáti, kunnu bert latast til aðra húkaveiði.
Stk. 3. Landsstýrið kann í kunngerð áseta reglur um, at persónar og feløg í einari sýslu hava framhjárætt til at bjóða, tá fiskifør úr sýsluni vera seld.

§ 17. Um partur av heildarkvotu ikki er latin sum egin kvotupartur sambært § 5, stk. 6, ella kvotupartur latin landsstýrinum innaftur sum ónýttur, kann landsstýrið

Kapitel 3
Regler om kvoterettigheder

§ 12. Fartøjer med fangsttilladelse og fiskeritilladelse har ret til kvoteandel eller til at fiske af totalkvote.

§ 13. Ingen kan råde over mere end 10% af alle totalkvoter på færøsk fiskeriterritorium.

§ 14. Landsstyret er bemyndiget til at fastsætte afgift for kvoterettigheder for hvert fiskeriår. Ved fastsættelse af afgiftsbeløbet, skal der især lægges vægt på ressourcerenten.

§ 15. Individuel kvoteandel kan overføres eller udlejes til andre, såfremt disse opfylder lovens betingelser iøvrigt, med de begrænsninger, der er fastsat i stk. 2 og § 16. Overførsel af kvoter skal meddeles og godkendes af landsstyret inden fiskeri påbegyndes. Kvoteandelen kan ikke pantsættes.
Stk. 2. Kvoter eller dele af kvoter kan ikke overføres til andre i mere end 1 år ad gangen. Såfremt en kvote i to følgende år kun anvendes i lejeaftale mod betaling, tilfalder kvoten fælleskvoten for vedkommende fartøjsgruppe.

§ 16. Med de begrænsninger der er omtalt i § 15 kan kvoterne omsættes frit i et kvoteår.
Stk. 2. Individuelle kvoteandele, som er tildelt til fangst med kystfiskerfartøj, kan kun overføres til anden krogfangst.
Stk. 3. Landsstyret kan i bekendtgørelse fastsætte regler om, at personer og selskaber i et syssel har fortrinsret til at byde, når fiskefartøjer i syslet er til salg.

§ 17. Såfremt del af totalkvote ikke er tildelt som individuel kvoteandel i henhold til § 5, stk. 6, eller kvoteandel er retur-

umseta hann sum egna kvotupart hjá øðrum.

§ 18. Fiskiskapur skal steðga beinanvegin, tá ið egna árskvotan, felagsárskvotan ella hjávciðukvotan er uppfiskað.
Stk. 2. Fiskiloyvi ella partar av fiskiloyvi detta burtur av sær sjálvum, tá ið kvotan er uppfiskað.

§ 19. Landsstýrið kann gera av, at veiðunøgdir av ávísum fiskasløgum skulu hækkast við ávísum prosentparti, tá roknað verður, hvussu nógv av egnu árskvotuni ella felags árskvotuni er nýtt, um fiskurin verður avreiddur ella fluttur óvirkaður uttaniands. Óvirkaður fiskur er ósløgdur, sløgdur ella avhøvdaður fiskur, sama hvussu hann er goymdur.

§ 20. Fiskirannsóknarstovan hevur loyvi at fremja vísindaligar fiskirannsóknir, við egnum ella leigaðum fiskiførum, uttan mun til reglurnar í hesi lóg.
Stk. 2. Royndarfiskiskapur krevur serstakt loyvi frá landsstýrinum. Landsstýrið kann áseta treytir fyri royndarfiskiskapi
Stk. 3. Landsstýrið kann uttan mun til galdandi avmarkingar í vinnuliga fiskiskapinum annars, loyva fiskiskapi sum liður í einari undirvísingar- og/ella menningarætlan.

§ 21. Veiða úr stovnum, ið ikki koma undir heildarkvotu ella skipan við serligum fiskiloyvi, er loyvd fiskiførum við veiðuloyvi og fiskiloyvi sambært § 5, stk. 3 og 4. Fiskiskapurin skal fara fram eftir teimum reglum, ið eru ásettar av Føroya landsstýri sambært § 9.
Stk. 2. Tá loyvi verður givið til veiði samhært stk. 1, kann landsstýrið leggja dent á m.a. at bøta um trupul viðurskifti hjá persónum og feløgum, ið standast av kvotabýtinum.

neret til landsstyret som uudnyttet, kan landsstyret omsætte denne som egen kvoteandel tilhørende en anden.

§ 18. Fiskeri skal ophøre øjeblikkelig, når egen årskvote, fælles årskvote eller bifangstkvote er opfisket.
Stk. 2. Fiskeritilladelse bortfalder automatisk, når kvoten er opfisket.

§ 19. Landsstyret kan afgøre, at fangstmængder af bestemte fiskesorter skal forhøjes med en vis procentdel, ved beregning af hvor stor en del af egen eller fælles årskvote, der er fisket, såfremt fisken udføres eller transporteres uforarbejdet til udlandet. Uforarbejdet fisk er urenset, renset eller hovedkappet fisk, uanset hvilken hvilken opbevaringsmåde, der anvendes.

§ 20. Fiskirannsóknarstovan har tilladelse til at udføre videnskabelige fiskeriundersøgelser med egne eller lejede fiskefartøjer, uanset reglerne i denne lov.
Stk. 2. Forsøgsfiskeri kræver særlig tilladelse fra landsstyret. Landsstyret kan fastsætte betingelser for forsøgsfiskeri.
Stk. 3. Landsstyret kan, uanset gældende begrænsninger i det erhvervsmæssige fiskeri iøvrigt, tillade fiskeri som et led i en undervisnings- og/eller udviklingsplan.

§ 21. Fiskeri af bestande, der ikke er omfattet af totalkvote eller ordning med særlig fiskeritilladelse er tilladt fiskefartøjer med fangsttilladelse og fiskeritilladelse i henhold til § 5, stk. 3 og 4. Fiskeriet skal foregå efter de regler, der er fastsat af Færøernes Landsstyre i henhold til § 9.
Stk. 2. Når tilladelse gives til fangst i henhold til stk. 1, kan landsstyret lægge vægt på bl.a. at kompensere personer og selskaber, der har særlige problemer i den udstrækning, disse er opstået på grund af kvotefordelingen.

Kapittul 4.
Ásetan av veiðurættindum á føroysku landleiðunum hjá fiskifør undir føroyskum flaggi.

§ 22. Løgtingið ásetir heildarkvotur fyri hvønn tiskastovn sær, hvørt fiskiárið. Áðrenn 1. juli á hvørjum ári letur Fiskirannsóknarstovan og Stovnsrøktarnevndin landsstýrinum frágreiðing um støðuna í teimum stovnum, sum verða gagnnýttir á føroysku landleiðunum, herundir serliga teimum, sum eru undir heildarkvotu. Í frágreiðingini mæla Fiskirannsóknarstovan og Stovnsrøktarnevndin til tiltøk, sum eru neyðug fyri at røkka endamálunum við hesi lóg. Frágreiðingin skal eisini fevna um hjáveiðu. Kemur Fiskirannsóknarstovan fram á, at lívfrøðiligu fortreytirnar, sum vóru galdandi, seinast heildarkvoturnar vórðu ásettar, eru munandi broyttar, skal hon saman við Stovnsrøktarnevndini gera nýtt tilmæli um mest loyvdu veiðuna komandi árið.

Stk. 2. Landsstýrið leggur frágreiðing fyri Føroya løgting við øllum upplýsingum av týdningi viðvíkjandi ásetingini av mest loyvdu veiðu og heildarkvotum og leggur fram uppskot um ásetan av mest loyvdu veiði.

Stk. 3. Fiskiárið byrjar 1. september og endar 31. august. **Heildarkvotur** fyri komandi árið verða ásettar í seinasta lagi 10. august sama árið, kvotuskeiðið byrjar.

Stk. 4. Ásetingin um MLV, ið samtykt er við gildiskomu lógarinnar, kann tó í fyrsta lagi verða broytt í august 1995. MLV fyri tíðarskeiðið fram til 1. september 1994 verður helvtin av MLV fyri tíðarskeiðið 1. september 1994 til 31. august 1995.

Kapitel 4
Fastsættelse af fangstrettigheder på det færøske fiskeriterritorium for fiskerfartøjer under færøsk flag

§ 22. Lagtinget fastsætter totalkvoter for hver enkelt fiskebestand hvert fiskeriår. Før 1. juli hvert år tilsender Fiskirannsóknarstovan og Stovnsrøktarnevndin redegørelse for tilstanden i de bestande, som udnyttes på færøsk fiskeriterritorium, herunder særlig de bestande, der er omfattet af totalkvoten. I redegørelsen afgiver Fiskirannsóknarstovan og Stovnsrøktarnevndin indstilling om hvilke tiltag, der er nødvendige for at opnå formålene med denne lov. Redegørelsen skal også omfatte bifangste. I tilfælde af at Fiskirannsóknarstovan finder, at de biologiske forhold, som er gældende, da totalkvoterne blev fastsat, er væsentligt ændrede, skal Fiskirannsóknarstovan sammen med Stovnsrøktarnevndini afgive ny indstilling om højst tillatc fangst for det kommende år.

Stk. 2. Landsstyret giver Færøernes lagting en redegørelse med alle oplysninger af betydning vedrørende fastsættelsen af højst tilladte fangst og totalkvote og forelægger forslag om fastsættelse af højst tilladte fangst.

Stk. 3. Fiskeriåret begynder 1. september og slutter 31. august. **Totalkvoter** for det kommende år fastsættes senest 10. august i det samme år som kvoteperioden begynder.

Stk. 4. Fastsættelsen af HTF, der er vedtaget ved lovens ikrafttræden, kan dog først ændres i august 1995. HTF for perioden frem til 1. september 1994 udgør halvdelen af HTF for perioden 1. september 1994 til 31. august 1995.

Kapittul 5.
Veiða á føroysku landleiðunum við fiskiførum, sum eru undir fremmandum flaggi.

§ 23. Hóast forboðnum í § 10, stk. 5 móti at fiskifør, sum eru undir fremmandum flaggi, og ríkisborgarar, sum ikki eru heimahoyrandi í Føroyum, reka vinnuligan fiskiskap á føroysku landleiðunum, kann landsstýrið loyva tílíkan fiskiskap sambært sínámillum fiskivinnuavtalum við onnur lond.
Stk. 2. Hóast kravið um, at bert fiskifør úr londum, sum Føroyar hava sínámillum fiskivinnuavtalu við, kunnu fáa loyvi at reka fiskiskap á føroysku landleiðunum, kann landsstýrið gera undantak frá hesi reglu, um tað tænir royndarendamálum ella er liður í royndum at menna nýggja veiði ella fiskavirking.

§ 24. Fiskifør undir fremmandum flaggi hava loyvi at veiða tær veiðunøgdir av ymiskum fiskastovnum undir Føroyum, sum eru avtalaðar millum myndugleikarnar í hesum londum og Føroya landsstýri á hvørjum ári.
Stk. 2. Fiskifør undir fremmandum flaggi kunnu bert byrja fiskiskap á føroysku landleiðunum, um tey eru á einum lista, sum heimland teirra hevur sent landsstýrinum við navni, skrásetingarnummari og øðrum neyðugum upplýsingum, áðrenn nýtt fiskiár byrjar. Broytingar kunnu gerast í listanum í fiskiárinum.

§ 25. Landsstýrið kann í kunngerð áseta nærri reglur um fiskiskap á føroysku landleiðunum hjá fiskiførum undir fremmandum flaggi við atliti at § 9 og sínámillum fiskivinnuavtalunum.

Kapitel 5
Fiskeri på færøsk fiskeriterritorium med fiskefartøjer under fremmed flag.

§ 23. Uanset forbudet i § 10, stk. 5, mod at fiskefartøjer, der er under fremmed flag, og statsborgere, der ikke er hjemmehørende på Færøerne, driver erhvervsmæssigt fiskeri på færøsk fiskeriterritorium, kan landsstyret tillade sådant fiskeri i henhold til bilaterale fiskeriaftaler med andre lande.
Stk. 2. Uanset kravet om, at kun fiskefartøjer fra lande, som Færøerne har bilaterale fiskeriaftaler med, kan få tilladelse til at drive fiskeri på færøsk fiskeriterritorium, kan landsstyret gøre undtagelser fra denne regel, hvis det tjener forsøgsformål eller er led i forsøg på at udvikle nye fiskerier eller fiskeforarbejdning

§ 24. Fiskefartøjer under fremmed flag har tilladelse til at fiske de fangstmængder af diverse fiskebestande ved Færøerne, der hvert år aftales mellem myndighederne i de respektive lande og Færøernes landsstyre.
Stk. 2. Fiskefartøjer under fremmed flag kan kun påbegynde fiskeri på færøsk fiskeriterritorium, såfremt de er opført på en liste, som deres hjemland har sendt landsstyret med navn, registreringsnummer og andre nødvendige oplysninger, inden nyt fiskeriår påbegyndes. Der kan foretages ændringer i fortegnelsen i fiskeriåret.

§ 25. Landsstyret kan i bekendtgørelse fastsætte nærmere regler om fiskeri på færøsk fiskeriterritorium for fiskefartøjer under fremmed flag i overensstemmelse med § 9 og bilaterale fiskeriaftaler.

Kapittul 6.
Veiðurættindi uttan fyri føroysku landleiðirnar hjá teimum, sum eiga fiskifør, sum eru undir føroyskum flaggi.

§ 26. Veiðunøgdirnar, fiskifør undir føroyskum flaggi kunnu veiða uttanfyri føroysku landleiðirnar, verða ásettar fyri eitt ár í senn, sambært sínámillum fiskivinnuavtalum við onnur lond og semjum í millumlanda og altjóða fiskivinnunevndum. Landsstýrið kann luta hesar nøgdir út sum egnar kvotupartar, egnar árskvotur ella felagsárskvotur. Egnir kvotupartar og árskvotur koma undir somu reglur sum egnir kvotupartar og árskvotur á føroysku landleiðunum.

Stk. 2. Reglur og treytir fyri fiskiskapi eru tær, sum eru galdandi í fiskivinnuøkinum hjá teimum londum, sínámillum fiskivinnuavtala er gjørd við. Í altjóðasjógvi galda tær reglur, sum avtalaðar eru í millumlanda og altjóða fiskivinuunevndum.

Stk. 3. Landsstýrið boðar á hvørjum ári, áðrenn nýggja fiskiárið, galdandi fyri veiðu uttan fyri 200 fjórðinga, byrjar, eigarum av fiskiførum, sum hava veiðuloyvi í fremmandum sjógvi, frá veiðurættindum teirra og tilskilar á hvørjum leiðum og úr hvørjum stovnum frítt er at veiða.

Kapittul 7.
Skiftisreglur og ymiskar ásetingar.

§ 27. Heildarkvotur á landleiðunum fyri fiskifør undir føroyskum flaggi verða ásettar fyri hesar fiskastovnar fyri fyrsta kvotuárið.

Tons rund vekt:

Toskur á landgrunninum	8.600
Toskur á Føroya Banka	1.400
Hýsa	7.500
Upsi	41.500
Kongafiskur	13.300

Kapitel 6.
Fiskeriretligheder uden for færøsk fiskeriterritorium for ejere af fiskefartøjer, der er under færøsk flag.

§ 26. Fangstmængderne, som fiskefartøjer under færøsk flag kan fiske uden for færøsk fiskeriterritorium, fastsættes for et år ad gangen, i henhold til bilaterale fiskeriaftaler med andre lande og overenskomster i bilaterale og internationale fiskerikommissioner. Landsstyret kan tildele disse mængder som individuelle kvoteandele, egne årskvoter eller fællesårskvoter. For individuelle kvoteandele og årskvoter gælder de samme regler som vedrørende individuelle kvoteandele og årskvoter på færøsk fiskeriterritorium.

Stk. 2. Regler og betingelser for fiskeri er de samme, som gælder for fiskeriterritorierne de lande, Færøerne har bilaterale fiskeriaftaler med. I internationalt farvand er de regler gældende, som er aftalt i internationale fiskerikommissioner.

Stk. 3. Landsstyret oplyser hvert år, forinden det nye fiskeriår, gældende for fangst udenfor 200 sømil, begynder, ejerne af fiskefartøjer, der har fangsttilladelse i fremmed farvand, om deres fangstrettigheder og specificerer i hvilke farvande og af hvilke resourcer det er tilladt at fiske frit.

Kapitel 7.
Overgangsregler og forskellige bestemmelser.

§ 27. Totalkvoter på fiskeriterritoriet for fiskefartøjer under færøsk flag fastsættes for disse fiskebestande for det første kvoteår.

Tons, rund vægt:

Torsk på landsokkelen	8.600
Torsk på Føroya Banka	1.400
Kuller	7.500
Sej	41.500
Rødfisk	13.300

§ 28. Felags kvotupartar verða ásettir fyri hesar fimm bólkar av fiskiførum á føroysku landleiðunum:
Bólkur 1: Ståltrolarar yvir 400 Hk, lemmarolarar
Bólkur 2: Ståltrolarar yvir 400 Hk, pør
Bólkur 3: Stállínuskip yvir 110 BRT
Bólkur 4: Útróðrarbátar yvir 20 BRT
Bólkur 5: Útróðrarbátar undir 20 BRT
Stk. 2. Felags kvotupartarnir verða roknaðir hvørjum bólki sær. Tá lógin fær gildi verður prosentbýtið av teimum ymisku fiskastovnunum soleiðis:

§ 28. Fælles kvoteandele fastsættes for disse fem grupper fiskefartøjer på færøsk fiskeriterritorium:
Gruppe 1: Ståltrawlere over 400 Hk, dørtrawlere
Gruppe 2: Ståltrawlere over 400 Hk, par
Gruppe 3: Stållinebåde over 110 BRT
Gruppr 4: Kystfiskefartøjer over 20 BRT
Gruppe 5: Kystfiskefartøjer under 20 BRT
Stk. 2. Fælles kvoteandele beregnes for hver induvidiel gruppe. Når loven træder i kraft fastsættes procentfordelingen af de forskellige fiskebestande således:

	Toskur Torsk	Hýsa Kuller	Upsi Sej	Kongafiskur Rødfisk
Bólkur 1: Trol, lemmatrolarar				
Gruppe 1: Trawl, dørtrawlere	3,5%	1,75%	13%	89,5%
Bólkur 2: Trol, pør				
Gruppe 2: Trawl, par	16,5%	8,25%	67%	8,5%
Bólkur 3: Línuskip				
Gruppe 3: Lineskibe	25%	29%		1%
Bólkur 4: Útróðrarbátar yvir 20 BRT				
Gruppe 4: Kystfiskefartøjer over 20 BRT	29%	29%	12%	1%
Bólkur 5: Útróðrarbátar undir 20 BRT				
Gruppe 5:Kystfiskefartøjer under 20 BRT	25%	30%	8%	
Bólkur 6: Onnur				
Gruppe 6: Andre	1%	2%		

§ 29. Innan fyri hvønn av bólkunum av fiskiførum í § 28, stk. 1, verður egni kvotuparturin hjá skipi roknaður soleiðis:
1) Bólkur 1 verður skipaður í tríggjar undirbólkar soleiðis:
   A: Djúpvatns lemmatrolarar y. 400 BRT, 2100 Hk ella meira.
   B: Djúp- og meðalvatns lemmatrolarar u. 400 BRT, 1200 Hk ella meira.
   C: Lemmatrolarar u. 400 BRT, minni enn 1200 Hk.
   Í bólki A verður tillutað hvørjum skipi av MLV:

§ 29. Inden for hver af grupperne af fiskefartøjer i § 28, stk. 1. beregnes fartøjets individuelle kvoteandel således:
1) Gruppe 1 deles i tre undergrupper således:
   A: Dybvands dørtrawlere o. 400 BRT, 2100 Hk eller mere.
   B: Dyb- og mellemvands dørtrawlere u. 400 BRT, 1200 Hk eller mere.
   C: Dørtrawlere u. 400 BRT, mindre end 1200 Hk.
   I gruppe A tildeles hvert skib af HTF:
   Torsk 0,24%, kuller 0,12%, sej

Toskur 0,24%, hýsa 0,12%, upsi 0,60%, kongafiskur 8,27%.
Í bólki B verður tillutað hvørjum skipi av MLV:
Toskur 0,24%, hýsa 0,12%, upsi 1,20%, kongafiskur 4,14%.
Í bólki C verður tillutað hvørjum skipi av MLV:
Toskur 0,24%, hýsa 0,12%, upsi 1,20%, kongafiskur 1,88%.

2) Bólkur 2 verður skipaður í tríggjar undirbólkar:
A: Partrolarar størri enn 220 BRT, 1150 Hk ella meira, byggiár 1984 ella seinni.
B: Partrolarar y. 200 BRT, 700 Hk ella meira.
C: Partrolarar u. 200 BRT, minni enn 700 Hk.
Í bólki A verður tillutað hvørjum skipi av MLV:
Toskur 0,45%, hýsa 0,23%, upsi 2,41%, kongafiskur 0,25%.
Í bólki B verður tillutað hvørjum skipi av MLV:
Toskur 0,45%, hýsa 0,23%, upsi 1,81%, kongafiskur 0,22%.
Í bólki C verður tillutað hvørjum skipið av MLV:
Toskur 0,45%, hýsa 0,23%, upsi 1,20%, kongafiskur 0,20%.

3) Bólkur 3: Býtt verður javnt ímillum skipini í bólkinum.

4) Bólkur 4 fiskar av felags árskvotu. Fyri útróðrarbátar yvir 20 BRT í bólki 4, sum veiða við troli, verður teirra procentpartur, sum er 6,5% av samlaða tonsatalinum fyri hvønn fiskastovnin sær, frábýttur. Um útróðrabátur leggur umaftur frá troli til líni-/snelluveiði, fellur hansara partur inn aftur í bólkin.

5) Bólkur 5 fiskar av felags árskvotu.

6) Fiskitíðin fyri bátar, ið fiska av felagskvotu, verður býtt í trý tíðarskeið:
1: september - desember
2: januar - april

0,60%, rødfisk 8,27%.
I gruppe B tildeles hvert skib af HTF:
Torsk 0,24%, kuller 0,12%, sej 1,20%, rødfisk 4,14%.
I gruppe C tildeles hvert skib af HTF:
Torsk 0,24%, kuller 0,12%, sej 1,20%, rødfisk 1,88%.

2) Gruppe 2 deles i tre undergrupper:
A: Partrawlere større end 220 BRT, 1150 Hk, byggeår 1984 eller senere.
B: Partrawlere o. 200 BRT, 700 Hk eller mere.
C: Partrawlere u. 200 BRT, mindre end 700 Hk.
I gruppe A tildeles hvert skib af HTF:
Torsk 0,45%, kuller 0,23%, sej 2,41%, rødfisk 0,25%.
I gruppe B tildeles hvert skib af HTF:
Torsk 0,45%, kuller 0,23%, sej 1,81%, rødfisk 0,22%.
I gruppe C tildeles hvert skib af HTF:
Torsk 0,45%, kuller 0,23%, sej 1,20%, rødfisk 0,20%.

3) Gruppe 3: Der fordeles lige mellem skibene i gruppen.

4) Gruppe 4 fisker af fælles årskvote. For kystfiske fartøjer over 20 BRT i gruppe 4. der fisker med trawl, bliver deres procentandel, som er 6,5% af det samlede tonstal, for hver individuel fiskeressource, fradelt. Såfremt kystfiskefartøj igen omlægger fra trawl til line-/snelle, falder dennes andel tilbage i gruppen.

5) Gruppe 5 fisker af fælles årskvote.

6) Fisketiden for både, der fisker af fælleskvote, deles i tre perioder:
1: september - december
2: januar - april
3: maj - august.
Dog i 1994 fra marts til august.

Stk. 2. I den første kvotefordeling tildeles

3: mai - august.
Tó í 1994 frá mars til august.

Stk. 2. Í fyrsta kvotubýti umfari verður ikki kvota ella kvotapartur tillutaður fiskifari, sum ikki er í vinnu ella møguliga ikki fer í vinnu fyribils. Er vissa fyri, at farið kemur í vinnu rímiligan part av fyrsta fiskiári útskrivar landsstýrið kvotubræv. Kvota ella partar av kvotu solciðis ónýttur fellur til hini førini í avvarandi høvuðsbólki. Henda regla ávirkar ikki fríu umsetiligheitina smb. § 16 annars, tá kvotubræv endaliga er útskrivað.
Stk. 3. Landsstýrinum verður heimilað at býta ónýttar kvotur eftir býtislykli, grundað á tilætlingina í hesi lóg, javnt til fiskiflotan.

ikke kvote eller kvoteandel til fiskefartøj, der ikke er i drift eller muligvis ikke foreløbigt optager drift. Er der sikkerhed for, at fartøjet kommer i drift i en rimelig del af det første fiskeriår, udskriver landsstyret kvotebrev. Kvote eller dele af kvote, der således er uudnyttede, tilfalder de andre fartøjer i vedkommende hovedgruppe. Denne bestemmelse påvirker ikke den frie omsættelighed iøvrigt i henhold til § 16, når kvotebrev udskrives endeligt.
Stk. 3. Landsstyret bemyndiges til at fordele uudnyttede kvoter efter fordelingsnøgle, der er baseret på hensigten i foreliggende lov ensartet til fiskefl åden.

§ 30. Egnar kvotur, felags kvotur og heildarkvotur hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi uttan fyri landleiðirnar verða ásettar á sama hátt í 1994, sum í 1993.

§ 30. Individuelle kvoter, fælles kvoter og totalkvoter for fiskefartøjer under færøsk flag uden for fiskeriterritoriet fastsættes på samme måde i 1994 som i 1993.

§ 31. Talið av veiðuloyvum, sum fáa egna kvotu ella felagskvotu í hvørjum bólki av fiskiførum undir føroyskum flaggi, er tað talið, sum varð útskrivað frá landsstýrinum til fiskifør 20 BRT ella meira í 1993.

§ 31. Tallet af fangsttilladelser, som får tildelt egen kvote eller fælles kvote i hver gruppe fiskefartøjer under færøsk flag, er det antal, der blev udskrevet af landsstyret i 1993 til fiskefartøjer på 20 BRT eller mere.

Kapittul 8.
Hagtøl v.m.

§ 32. Landsstýrið ásetur reglur um, at fiskiførum undir føroyskum flaggi og fiskakeyparum og øðrum, sum taka veiðu ella fiskavøru inn á goymslu, til umskipingar ella til at føra til avreiðingar uttanlands, verður álagt at lata inn veiðutøl, dagbókur, vektarseðlar, upplýsingar um avreiðingar og aðrar upplýsingar um fiskiskap til hagfrøðiligt og eftirlitsendamál.
Stk. 2. Landsstýrið kann ásetta reglur um, at allar upplýsingar, sum verða kravdar

Kapitel 8.
Statistik m.m.

§ 32. Landsstyret fastsætter regler om, at fiskefartøjer under færøsk flag, fiskekøbere og andre, der modtager fangst eller fiskeprodukter til lager, til omladning eller til at føre til opskibning udenlands, pålægges at indsende fangsttal, dagbøger, vægtsedler, oplysninger om salg og andre oplysninger om fiskeri til brug for statistiske og kontrolformål.
Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte regler om, at alle oplysninger, der kræves efter

eftir stk. 1., eisini skulu latast inn, tá veiða hjá útlendskum skipum verður løgd upp, fyribils goymd ella umskipað í Føroyum til at flyta víðari.

Kapittul 9.
Fiskiveiðueftirlitið.

§ 33. Fiskiveiðueftirlitið er stovnur undir landinum, hvørs endamál er at fyrisita fiskiveiðueftirlitinum á sjógvi og landi sambært hesi lóg. Landsstýrið ásetur nærri reglur um fiskiveiðueftirlit og um skipan av fiskiveiðueftirlitinum, herundir um eygleiðaraskipan. Landsstýrið kann heimila fiskiveiðueftirlitinum at fremja tær heimildir, sum landsstýrið hevur eftir hesi lóg.
Stk. 2. Eftirlitið á sjónum við hesi lóg útinnir fiskiveiðieftirlitið á sjónum. Fiskiveiðieftirlitið á sjónum er samansett av skipum frá føroyska fiskiveiðieftirlitinum og flogførum og eftirlitsskipum frá donsku sjóverjuni. Samstarvið millum fiskiveiðieftirlitið og donsku sjóverjuna verður útint eftir samstarvsavtalu partanna millum.
Stk. 3. Tað áliggur fiskiveiðueftirlitinum at samskipa og gera avtalur við aðrar partar um at útinna allar fiskiveiðueftirlitsuppgávur eftir hesi lóg.
Stk. 4. Fiskiveiðueftirlitið hevur landsstýrisins vegna eftirlitið á landleiðunum við virksemi og viðurskiftum, sum kunnu ávirka møguleikarnar at reka fiskivinnu.

§ 34. Fiskiveiðueftirlitið ansar eftir, at reglurnar í hesi lóg og reglur ásettar við heimild í hesi lóg verða hildnar.
Stk. 2. Tað áliggur fiskiveiðueftirlitinum at hava eftirlit við øðrum uppgávum, sum landsstýrið leggur til fiskiveiðueftirlitið at fyrisita.

§ 35. Fiskiveiðueftirlitið á sjónum kann steðga fiskiførum og fiskaflutningsførum, fara um borð at gera tænastukanningar, herundir kanna skipsskjøl, manningarskjøl,

stk. 1. også skal indleveres, når udenlandske skibes fangster lægges op, bliver midlertidigt opbevaret eller omladet på Færøerne til videre transport.

Kapitel 9.
Fiskerikontrol

§ 33. Fiskerikontrollen er en landsinstitution med det formål at administrere regler om fiskerikontrollen på havet og på land i henhold til denne lov. Landsstyret fastsætter nærmere regler om fiskerikontrollen og om organisationen af denne, herunder regler om en observatørordning. Landsstyret kan bemyndige fiskerikontrollen at udføre de hjemler, landsstyret har i henhold denne lov.
Stk. 2. Tilsynet til søs med denne lov udføres af fiskeriinspektionen. I fiskeriinspektionen indgår skibe fra den færøske fiskerikontrol samt fly og inspektionsskibe fra det danske forsvar. Samarbejdet mellem den færøske fiskerikontrol og det danske forsvar fastlægges i en samarbejdsaftale mellem parterne.
Stk. 3. Det påhviler fiskerikontrollen at koordinere og indgå aftaler med andre parter om udførelsen af alle fiskerikontrolopgaver i henhold til denne lov.
Stk. 4. Fiskerikontrollen udøver på landsstyrets vegne på fiskeriterritoriet tilsynet med virksomhed og forhold, der kan påvirke mulighederne for at drive fiskeri.

§ 34. Fiskerikontrollen tilser, at reglerne i denne lov og regler fastsat med hjemmel i denne lov overholdes.
Stk. 2. Det påhviler fiskerikontrollen at påtage sig andre opgaver, som landsstyret pålægger fiskerikontrollen at administrere.

§ 35. Fiskeriinspektionen kan standse fiskefartøjer og lastskibe, der fører fisk, gå ombord for at udføre tjenesteundersøgelser, herunder undersøge skibsdokumenter,

skipsdagbøkur, kvotabøkur, lasta- og framleiðslubøkur og -uppgerð, reiðskap og veiðu og kann krevja, at reiðskapur og veiða verður tikin til nærri kanningar. Fiskifør kunnu eisini verða tikin inn í føroyska havn til nærri kanningar av reiðskapi og veiðu.

Stk. 2. Fiskiveiðueftirlitinum verður heimilað at áseta bráðfeingis veiðubann fyri ávísar veiðuhættir á ávísunu leiðum á landleiðunum, har íblandingin av ungfiski er meira enn ásetta hámarkið. Bráðfeingis veiðubann kann lýsast fyri upp til 2 vikur hvørja ferð. Fiskiveiðueftirlitinum verður somuleiðis heimilað at loyva einstøkum fiskiførum at gera royndir á bráðfeingis stongdari leið til tess at staðfesta, um bráðfeingis veiðubann skal verða áset av nýggjum. Bráðfeingis veiðubann verður lýst í Útvarpi Føroya.

bemandingsdokumenter, skibsdagbøger, kvotabøger, last- og produktionsbøger og -opgørelser, redskaber og fangst og kan kræve, at redskab og fangst bliver taget til nærmere undersøgelse. Fiskefartøjer kan også tages ind til færøsk havn til nærmere undersøgelse af redskaber og fangst.

Stk. 2. Fiskerikontrollen bemyndiges til at fastsætte midlertidigt fangstforbud som bestemte fangstmetoder på bestemte områder af fiskeriterritoriet, hvor ungfiskeandelen er højere end det fastsatte maksimum. Midlertidigt fangstforbud kan fastsættes for op til 2 uger ad gangen. Fiskerikontrollen bemyndiges ligeledes til at tillade enkelte fiskefartøjer at drive forsøgsfiskeri på midlertidig lukket område for at stadfæste, om midlertidigt fangstforbud skal fastsættes på ny. Midlertidigt fangstforbud bekendtgøres i Færøernes radio.

§ 36. Landsstýrið kann áleggja fiskiførum at hava umborð eygleiðarar frá fiskiveiðueftirlitinum at gera kanningararbeiði í samband við fiskiveiðu við fiskiførum undir føroyskum flaggi á landleiðunum og uttan fyri landleiðirnar og fiskiførum undir fremmandum flaggi á føroysku landleiðunum. Útreiðslur til kost og uppihald ber fiskifarið. Eygleiðarar hava loyvi at nýta samskiftisútgerð fiskifarsins til tess at hava samband við myndugleikar á landi og við fiskiveiðueftirlitið.

§ 36. Landsstyret kan pålægge fiskefartøjer at have observatører fra fiskerikontrollen ombord til at udføre undersøgelser i forbindelse med fiskeri med fiskefartøjer under færøsk flag på fiskeriterritoriet og uden for fiskeriterritoriet og med fiskefartøjer under fremmed flag på det færøske fiskeriterritorium. Udgifter til kost og logi afholdes af fiskefartøjet. Observatører har, for at kunne have forbindelse med myndigheder på land og fiskerikontrollen, ret til at benytte fiskerfartøjets kommunikationsudstyr.

§ 37. Fiskiveiðueftirlitið á sjónum kann krevja, at fiskifar verður verandi á eini knattstøðu í áseta tíð til tess, at kanningar kunnu fremjast. Knattstøða og tíðarskeið skal so vítt gjørligt verða avtalað við skipara á avvarðandi fiskifari, tó soleiðis, at hetta ikki darvar fiskiskapinum óneyðugt.

§ 37. Fiskeriinspektionen kan kræve, at et fiskefartøj befinder sig på en bestemt position i et angivet tidsrum i undersøgelsesøjemed. Position og tidsrum skal så vidt muligt være aftalt med vedkommende skibs fører således, at det ikke hindrer fiskeriet unødvendigt.

§ 38. Landsstýrinum verður heimilað at áseta reglur um at forða fyri, at veiða, sum er fiskað í stríð við hesa lóg eila

§ 38. Landsstyret bemyndiges til at fastsætte regler for at forhindre at fangst, der er fisket i strid med denne lov eller regler

reglum ásettar samsvarandi hesi lóg, verða yvirførdar til onnur før ella avreidd, herundir um

1) skyldu at fráboða veiðunøgd
2) forboð móti at taka ímóti veiðu frá persónum ella fiskiførum og feløgum v.m., sum ikki hava veiðurættindi, og
3) forboð at taka ímóti veiðu, tá kvotan er uppfiskað.

§ 39. Fiskifør skulu á landleiðunum hava allan fiskireiðskapin burturstúvaðan innanborða á sínum náttúrliga staði, tá tey eru stødd á eini leið, har tað ikki er loyvt fiskifarinum at fiska. Tað sama er galdandi, tá fiskifarið liggur í havn.

Kapittul 10
Revsireglur v.m.

§ 40. Um ikki harðari revsing er ásett eftir aðrari lóg, verður tann revsaður við bót, ið:

1) brýtur reglur ásettar við heimild í § 9, stk. 1 og stk. 2 og reglur ásettar við heimild í § 25 viðvíkjandi skipanini av fiskiskapinum,
2) brýtur reglurnar í § 10, stk. 1-6
3) brýtur reglurnar í §§ 7 og 11, § 18, stk. 2, § 21, stk. 1, 1. punktum, § 24, stk. 2 og reglur ásettar við heimild í § 21 annars,
4) fylgir ikki treytum knýttar at loyvum latin eftir hesl lóg,
5) ger ikki eftir boðum ella forboðum givin sambært lógini ella reglum ásettar við heimild í lógini,
6) letur ósannar ella villleiðandi upplýsingar ella heldur aftur upplýsingum til nýtslu í prógførslu eftir lógini ella sum eru kravdar sambært lógini.

Stk. 2. Í kunngerðum gjørdar við heimild í lógini kann vera ásett revsing við bót fyri brot á reglur í hesum kunngerðum.

Stk. 3. Um brot verður framt av parta-

fastsat i henhold til denne lov, overføres eller afhændes til andre fartøjer, herunder regler om

1) pligt til at anmelde fangstmængde,
2) forbud mod at tage imod fangst fra personer eller fiskefartøjer og selskaber m.m., der ikke har fangstrettigheder, og
3) forbud mod at tage imod fangst, når kvoten er opfisket.

§ 39. Fiskefartøjer skal på fiskeriterritoriet have alle fangstredskaber bortstuvet ombord på rette plads, når de er på et område, hvor fiskefartøjet ikke har tilladelse til at fiske. Det samme er gældende, når fiskefartøjet ligger i havn.

Kapitel 10
Strafbestemmelser m.v.

§ 40. Medmindre højere straf er forskyldt efter anden lov, straffes med bøde den, der:

1) overtræder bestemmelser fastsat i henhold til § 9, stk. 1 og stk. 2 og regler fastsat i henhold til § 26 vedrørende organisering af fiskeriet,
2) overtræder bestemmelserne i § 10, stk. 1-6
3) overtræder bestemmelserne i §§ 7 og 11, § 19, stk. 2, § 22, stk. 1, 1. punktum, § 25, stk. 2 og bestemmelser i henhold til § 22.
4) ikke overholder betingelser i tilladelser givet i henhold til denne lov,
5) ikke følger påbud eller forbud givet i henhold til loven eller regler fastsat med hjemmel i loven.
6) giver usande eller vildledende oplysninger eller tilbageholder oplysninger til brug for bevisførelse ifølge loven eller som kræves ifølge loven.

Stk. 2. Der kan i bekendtgørelser udstedt med hjemmel i loven fastsættes bødestraf for overtrædelse af bestemmelser i disse.

felag, smápartafelag, lutafelag ella líknandi, kann felagið sum slíkt verða revsað við bót.

§ 41. Sektarpeningur, álagdur við heimild í hesi lóg, verður býttur eftir galdandi avtalu millum ríkisstýrið og landsstýrið.

§ 42. Fyri inndrátt eru reglurnar í borgarliga revsilógini galdandi. Veiða ella virðið av veiðu kann tó verða inndrigið, hóast tað ikki er endaliga staðfest, at øll veiðan er fiskað ólógliga.
Stk. 2. Fyri brot á reglurnar um útblaking og brot á reglurnar um at veiða á stongdari leið verður veiða og reiðskapur altíð at draga inn.
Stk. 3. Mál, sum viðvíkja brotum á lógina ella reglum ásettar við heimild í lógini, kunnu verða avgjørd av løgregluni eins væl og av skiparanum á avvarðandi fiskieftirlitsskipi, í samráð við fútan, um bót, inndráttur og gjald av sakarmálskostnaði verða góðtikin.
Stk. 4. Verður málið ikki avgreitt eftir stk. 3, verður málið lagt fyri dómsvaldið. Upplýst eigur at verða um rættin til at leggja málið fyri dómsvaldið og hvør freistin er. Áheitan um at fáa málið lagt fyri dómsvaldið skal boðast fútanum frá í seinast lagi 1 viku eftir, at avgerðin er boðað viðkomandi.
Stk. 5. Viðvíkjandi góðtøku eftir stk. 3 verður reglan í rættargangslógini um innihald í ákæruriti í løgreglumálum at nýta í hesum sambandi.

§ 43. Verður komið fram á ólógligan reiðskap í sjónum ella reiðskap, sum ikki er merktur sambært galdandi reglum, verður reiðskapurin inndrigin, um tað ikki kann verða greitt, hvør eigur hann. Sama er galdandi fyri reiðskap, ið er settur ella latin eftir á plássum, har fiskiskapur við hesum reiðskapi ikki er loyvdur, ella á leiðum, har onnur hava einarætt til fiski-

Stk. 3. Er overtrædelse begået af aktieselskab, anpartsselskab, andelsselskab el.lign., straffes selskabet som sådant med bøde.

§ 41. Bøder, pålagt med hjemmel i denne lov, fordeles efter gældende aftale mellem rigsmyndighederne og landsstyret.

§ 42. Vedrørende konfiskation er bestemmelserne i borgerlig straffelov gældende. Fangst eller værdi heraf kan dog inddrages, selv om det ikke er endeligt konstateret, at al fangsten er ulovlig.
Stk. 2. Overtrædes reglerne om forbud mod at kaste fangst over bord og udøves fiskeri på områder, der er lukket for fiskeri, kommer fangst og redskaber altid under konfiskation.
Stk. 3. Sager om overtrædelse af loven eller regler udstedt i henhold til loven, kan afgøres af såvel politiet som af føreren af vedkommende fiskeriinspektionsskib, i samråd med landfogeden, ved vedtagelse af bøde, konfiskation og sagsomkostninger.
Stk. 4. Afgøres sagen ikke i henhold til stk. 3, indbringes den for domstolene. Der bør oplyses om muligheden for, at forelægge sagen for domstolene og om fristen for forelæggelse. Begæring om forelæggelse for domstolene skal meddeles politimesteren senest 1 uge efter at afgørelsen er meddelt vedkommende.
Stk. 5. Med hensyn til den i stk. 3 nævnte vedtagelse finder bestemmelserne i retsplejeloven om anklageskrifts indhold i politisager tilsvarende anvendelse.

§ 43. Findes der ulovligt redskab i søen eller redskab, der ikke er mærket i henhold til gældende regler, inddrages redskaberne, såfremt det ikke kan påvises, hvem det tilhører. Det samme er gældende for redskaber, der er sat eller forladt på steder, hvor fiskeri med disse redskaber ikke er tilladt, eller på steder, hvor andre har eneret til fiskeri eller til en vis form

skap ella til ávíst slag av fiskiskapi.

§ 44. Útlendsk skip, ið hava framt fiskiskap á føroyskum landleiðum undir slíkum umstøðum, at revsiábyrgd er staðfest eftir reglunum í § 41, kunnu haldast aftur av eftirlitsmyndugleikanum til falnar bótarupphæddir og sakarmálskostnaður eru goldin, ella til trygd er veitt fyri gjaldingini. Er ikki goldið 2 mánaðir aftaná, at málið er endaliga avgjørt, kann fullnaður verða tikin í skipinum.

Stk. 2. Um nevndu myndugleikar halda skip aftur, verða reglurnar í kapittul 72 í rættargangslógini um at leggja hald á lutir, ið tað verður hildið rætt at draga inn, at nýta samsvarandi. Afturhald kann bert fremjast, um tað er neyðugt fyri at tryggja, at nevndu upphæddir verða goldnar.

§ 45. Fiskiveiðueftirlitið kann beinanvegin taka inn veiði- og fiskiloyvi, um skiparin á fiskifarinum er skuldsettur fyri brot á reglurnar í § 9, nr. 8, § 10, stk. 4, § 18 og um ovurveiða á og uttanfyri føroysku landleiðirnar verður framd. Landsstýrið kann haraftrat mótrokna nøgdina av mettu veiðuni, sum blakað er út aftur, í egnari árskvotu ella felagsárskvotu.

Stk. 2. Landsstýrið kann taka aftur veiðiloyvið fyri ávíst tíðarskeið, um skiparin á fiskifarinum er dømdur ella hevur góðtikið bót fyri brot á hesa lóg ella reglur, ásettar við heimild í lógini. Fiskiveiðueftirlitið kann beinanvegin taka aftur veiðuloyvið, um brot verða staðfest á reglurnar um vernd av ungfiski, ásettar sambært § 9. Loyvið kann verða tikið aftur upp til 3 vikur hvørja ferð.

Stk. 3. Veiðiloyvishavarin kann krevja, at avgerðin eftir stk. 1 og 2 verður løgd fyri dómsvaldið. Avgerðin skal innihalda upplýsing um rættin til at leggja avgerðina fyri dómsvaldið og kærufreist. Áheitan skal fráboðast landfútanum í seinasta lagi 1 viku eftir, at avgerðin er boðað viðkomandi. Málið verður lagt fyri dómsvaldið eftir

for fiskeri.

§ 44. Udenlandske skibe, der har fisket på færøsk fiskeriterritorium under sådanne omstændigheder, at strafansvar er indtrådt efter reglerne i § 41, kan tilbageholdes af kontrolmyndighederne til forfaldne bøder og sagsomkostninger er betalt, eller sikkerhed er stillet for betalingen. Sker dette ikke 2 måneder efter sagens endelige afgørelse, kan der søges fyldestgørelse i skibet.

Stk. 2. Såfremt et skib tilbageholdes af nævnte myndigheder, finder reglerne i kapitel 72 i retsplejeloven om beslaglæggelse af ting, der findes at burde inddrages, tilsvarende anvendelse. Beslaglæggelse kan kun foretages, såfremt det er nødvendigt for at sikre, at betaling finder sted.

§ 45. Fiskerikontrollen kan umiddelbart inddrage fangst- og fiskeritilladelse, såfremt føreren på fiskefartøjet er anklaget for overtrædelse af bestemmelserne i § 9, nr. 8, § 10, stk. 4, § 19 og for at have fisket mere end tilladt indenfor og udenfor færøsk fiskeriterritorium. Landsstyret kan yderligere modregne mængden af den anslåede fangst, der er kastet i havet, i individuel årskvote eller fælles årskvote.

Stk. 2. Landsstyret kan inddrage fangsttilladelsen for et bestemt tidsrum, såfremt fiskefartøjets fører er dømt eller har vedtaget bøde for overtrædelse af bestemmelserne i denne lov eller regler, fastsat med hjemmel i loven. Fiskerikontrollen kan umiddelbart inddrage fangsttilladelsen, såfremt der konstateres overtrædelse af reglerne om værn af ungfisk ifølge § 9. Tilladelsen kan inddrages for op til 3 uger ad gangen.

Stk. 3. Indehaveren af fangsttilladelsen kan kræve, at afgørelsen efter stk. 1 og 2 forelægges domstolene. Afgørelsen skal indeholde oplysning om retten til at indbringe afgørelsen for domstolene og ankefrist. Henvendelsen skal meddeles land-

reglunum í revsilógini § 78, stk. 3. Áheitanin frestar ikki tiknu avgerðina.

fogeden inden 1 uge efter, at vedkommende har fået meddelelse om afgørelsen. Sagen indbringes for domstolene efter reglerne i straffelovens § 78, stk. 3. Indbringelsen har ikke opsættende virkning.

§ 46. Brot á reglur ásettar við heimild í hesi lóg ella reglur um útinnan av embætisskyldu kunnu hava við sær, at landsstýrið kann taka aftur rættindi eftir hesi lóg endaliga ella fyribils.
Stk. 2. Slíkar avgerðir kunnu innan 2 vikur skjótast inn fyri Føroya Rætt. Hetta frestar ikki tiknu avgerðirnar.

§ 46. Overtrædelse af regler fastsat med hjemmel i denne lov eller regler om udførelse af embedspligt kan medføre, at landsstyret inddrager rettigheder efter denne lov endeligt eller midlertidigt.
Stk. 2. Sådanne afgørelser kan inden 2 uger indbringes for Færøernes Ret. Indbringelsen har ikke opsættende virkning.

§ 47. Brot á reglur fyri fiskiskapi við heimild í hesi lóg, ella brot á treytir í loyvum, kunnu hava við sær avmarkingar í rættinum at nýta givin loyvi og kvotur. Grov brot og endurtøka av brotum kunnu hava við sær, at givin rættindi verða tikin aftur. Slíkar avgerðir verða tiknar av landsstýrinum og kunnu áfrenn 2 vikur frá kunngerðardegi leggjast fyri Føroya Rætt.

§ 47. Overtrædelse af regler for fiskeri med hjemmel i denne lov, eller overtrædelser af betingelser i tilladelser, kan medføre begrænsninger i retten til at gøre brug af tilladelser og kvoter. Grove overtrædelser og gentagelser kan medføre, at givne rettigheder inddrages. Sådanne afgørelser tages af landsstyret og kan inden 2 uger fra bekendtgørelsesdagen indbringes for Færøernes Ret.

§ 48. Føroya Landsstýri kann áseta reglur um, at avgerðir um at taka aftur veiðu- og fiskiloyvi, sum tiknar eru sambært § 46, ikki kunnu kærast til landsstýrið.

§ 48. Færøernes Landsstyre kan fastsætte bestemmelser om, at afgørelser om at inddrage fangst- og fiskeritilladelser i henhold til § 46, ikke kan indbringes for landsstyret.

§ 49. Henda lóg fær gildi 1. mars 1994. Samstundis fara úr gildi løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978 um fiskiveiði á landleiðini, løgtingslóg nr. 77 frá 12. juni 1990 um fiskiveiðu á innaru landleiðini og í áum, løkum og vøtnum, løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond og løgtingslóg nr. 55 frá 22. september 1978 um regulering av føroyskum fiskiskapi uttan fyri landleiðina.
Stk. 2. Kunngerðir, sum eru settar í gildi við heimild í teimum lógum, sum fara úr gildi, hava framvegis gildi í tann mun tær ikki stríða ímóti ásetingunum eftir hesi lóg.

§ 49. Denne lov træder i kraft 1. marts 1994. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 8 af 29. marts 1978 om fiskeri på fiskeriterritoriet, lagtingslov nr. 77 af 12. juni 1990 om fiskeri på det indre fiskeriterritorium og i ferske vande, lagtingslov nr. 9 af 29. marts 1978 om fiskeriaftaler med fremmede lande og lagtingslov nr. 55 af 22. september 1978 regulering af færøsk fiskeri udenfor fiskeriterritoriet.
Stk. 2. Bekendtgørelser, givet med hjemmel i de love, der ophæves, har fremdeles gyldighed i det omfang de ikke er strid med bestemmelserne i denne lov.

Ein minniluti (Olaf Olsen) tekur ikki undir við landsstýrisuppskotinum og heldur ikki undir við uppskotinum, sum meirilutin hevur handað fiskivinnunevndini.

Minnilutin heldur fyri tað fyrsta, at tann stýring av fiskivinnuni, sum er skotin upp, er so víttfevnandi, at hon ger fiskimenn til finnur í einari skriviborðsætlan, sum einki hevur við teir veruligu veiðimøguleikarnar at gera. Harvið hava fiskimenn antin at royna at umgangast lógina ella at halda uppat at fiska. At seta nakað í gildi, sum eingin annar hevur fingið at virka, og sum øll vinnan í Føroyum vendir sær frá, er ikki skilagott, men avgjørt óráð. Hetta er eisini støðan hjá Bygnaðarnevndini, sum sigur, at "tað hevur største týdning, at vinnan góðtekur skipanina", og limir í Bygnaðarnevndini hava á fundum staðfest, at annars verður skipanin ómøgulig at umsita.

Tað eigur at verða sagt ríkisstjórnini frá, at tað er váðaverk at seta skipanina í gildi, og tað var eitt mistak, tá ið samtykt varð í tveimum lóggevandi tingum at geva avgerðarrættin frá sær til eina ópolitiska nevnd, uttan at hava vitan um, hvørja niðurstøðu, nevndin kom til. Hetta man eisini vera ein sera sjáldsom hending, at tvey parlament hava frásagt sær sín suverenitet í einum so álvarsligum máli.

Tað eigur at verða gjørt ríkisstjórnini greitt, at málið má viðgerast munandi betur, áðrenn nakað lógaruppskot kann verða framlagt av nýggjum.

Tað, sum kann og eigur at verða gjørt skjótt og nú, er at minka feskfiskaflotan við flestu av teimum veiðiførum, sum hava ligið nú í nógvar mánaðir, og síðani fylgja við, hvussu fiskiskapurin lagar seg. Um mett verður, at ov nógv verður veitt, eiga avmarkingar í veiðidøgum at setast í gildi alt eftir, hvussu støðan er.

Sagt er av teimum flestu, at veiðiflotin hevur verið alt ov stórur. Teir, sum hava verið fyri at skerja flotan mest, hava rátt til at skerja hann við upp til 40%. Vit eiga nú at ansa eftir, at flotin ikki verður so lítil, at ikki kann veiðast tað, sum hevði verið skilagott.

Tað kann nevnast, at trolaraflotin undir Føroyum er minkaður við hesum førum og bestakreftum seinastu 3 - 4 árini:
Skip farin:

Koralhav	1000	Polarhav	1000
Stjørnan	1000	Nípan	810
Slættaberg	880	Saksaberg	880
Hallarklettur	1540	Margretha	685
Brimborg	800	Sæborg	480
Føroyingur	850	Dalenni	1070
Neptun	810	Snoddi	2250
Anita	1125	Atlantis	690
Hamraberg	810	Havnarenni	480
Kapilssund	900	Leithamar	430
Miðhavið	1437	Neptunus	1800
Norðbúgvin	230	Polarborg I	4080

Polarborg II	4080	Sporið	500
Tjaldhamar	210	Vágsbugvin	400
Vesturleiki	810	Vørðuklettur	360
Ørnin	415	Norðingur	480
Fram	685	Skopuningur	1100
Túgvufossur	825		
35 skip			
			35.902 HK

Skip, sum liggja:

Havørnin	500	Nesbúgvin	750
Norðhav	1375	Ólavur Hvíti	600
Saturn	500	Keldan	1000
Columbus	810	Sandingur	690
Mars	880	Sjúrðarberg	1100
Vesturtúgva	810	Vestursøki	1040
12 skip			10.055 HK
Tilsamans 47 skip og			45.957 HK

Skip, komin aftrat:

Brimborg	1500	Strembingur	1100
Vesturbúgvin	1400	Gullberg	1400
Stjørnan	1200	Polarhav	1200
6 skip			7.800 HK
Netto farin úr flotanum:			
tilsamans 41 skip og			38.157 HK
Tað eru 53 skip eftir (56,4%)			65.642 HK (63,2%)

Av hesum sæst, at flotin er komin niður á tað lægst møguliga fyri at hava kapasitet til at fiska tað, sum eigur at verða veitt. Samstundis er eisini uppfylt tað, sum var høvuðsumrøðuevni á fundinum náttina millum 31. januar og 1. februar 1993 millum donsku stjórnina og Føroya landsstýri.

Minkingin av veiðiflotanum, serliga trolaraflotanum, saman við teim reglum, sum annars eru galdandi og avtalaðar viðvíkjandi friðing av gýtingar- og smáfiskaleiðum, øðrum langtíðarfriðaðum økjum, meskaviddum, legudøgum og haraftirat møguligari skipan við heildarkvotu fyri onkur fiskasløg, er ein avgjørt brúkilig loysn. Í øllum førum nógv betur loysn enn uppskotini um meira ella minni umsetiligar ella sølubarar eginkvotur.

Síðani eigur tíð av verða avsett til eina veruliga breiða politiska viðgerð av øllum fiskivinnumálsøkinum

soleiðis, at vit fáa allar reglur savnaðar í eina lóg. Ta nyttu hevur landsstýrisuppskotið í øllum førum gjørt, at tað vísir á fyrimunin við at savna alt regluverkið.

Minnilutin ivast ikki í, at tað er alt ov vánaligt og vandamikið at binda okkum til eina kvotaskipan, sum uppskotini miða ímóti. Eina skipan, sum næstan ikki slepst burtur úr aftur, tá ið hon vísir seg at hava oyðilagt alla fiskivinnuna. Helst ber eisini til at sannføra bæði okkum sjálvi og donsku stjórnina um, at fleiri av teim áður nevndu tiltøkum eru so mikið nýliga sett í verk, at tey ikki fyrr enn nú sýna ta positivu ávirkanina á menningina á fiskastovnarnar.

Tað eigur eisini at vera havt í huga, at bygnaðarnevndin gjørdi ikki tað arbeiðið, sum hon hevði fingið sum setning og sum ætlanin var í avtaluni frá 1. februar 1993.

Við hesum viðmerkingum setir minnilutin (Olaf Olsen) fram soljóðandi

I U p p s k o t

til

samtyktar

Landsstýrið boðar donsku ríkisstjórnini frá, at bæði politiski meirilutin á Føroya løgtingi og allir felagsskapir innan føroysku fiskivinnuna meta tað alt ov hættisligt at seta í verk ta skipan, sum bygnaðarnevndin hevur skotið upp.

Harafturímóti eru landsstýrið og løgtingið samd um, at við grundarlagi í verandi stovnsrøktarskipanum og nýkomnum uppskotum verður arbeitt víðari við at gera eina upp aftur betri og meira tíðarhóskandi føroyska fiskivinnulóggávu.

Hetta arbeiðið verður gjørt við breiðari politiskari luttøku og luttøku frá øllum týðandi felagsskapum og stovnum innan fiskivinnuna.

Ein annar minniluti (Jógvan Ingvard Olsen) hevur hesar viðmerkingar:

Í samband við fíggjarkreppuna í føroyska samfelagnum hevur landsstýrið gjørt fleiri avtalur við donsku ríkisstjórnina, heruppií eru avtalur, sum í stóran mun viðkoma føroysku fiskivinnuni.

Í avtaluni frá 1. februar 1993 sigur landsstýrið í eini fráboðan:
"Landsstyret nedsætter et strukturudvalg, der inden 1. juli 1993 skal fremkomme med forslag til en nettoreduktion af kapaciteten med henblik på at gøre fiskerierhvervet til et selvbærende erhverv hvilende bl.a. på det biologisk optimale fangstniveau i farvandet omkring Færøerne og på markedsøkonomiske vilkår. Hjemmestyret er indstillet på at revidere sin lovgivning i overensstemmelse med udvalgets rådgivning."

Í avtaluni frá 28. mai 1993 verður sagt í seinru helvt av pkt. 3:
"at landsstyret er indstillet på en reduktion af kapaciteten i det færøske fiskerierhverv til det biologisk og økonomisk bæredygtige, samt en regulering af fiskeriet med udgangspunkt i de anbefalinger, som

inden 1. juli 1993 ventes at fremkomme fra strukturudvalget."

Í protokollatinum til avtaluna 12. oktober 1993 stendur:

"Som opfølgning på aftalen af 1. februar 1993 har landsstyret tilsluttet sig anbefalingerne fra strukturudvalget om fiskerierhvervet og fremsætter i overensstemmelse hermed lovforslag om omsættelige fangstkvoter med virkning fra 1. januar 1994. På længere sigt vil landsstyret overveje at opnå et provenue i forbindelse med fangstkvoter."

Bygnaðarnevndin kom við sínum áliti 1. juli 1993, har sagt verður millum annað:

"Udvalget foreslår en ordning med individuelt omsættelige kvoter."

Hetta vísir, at landsstýrið hevur gjørt avtalu við donsku stjórnina um at seta í gildi "individuellar" handilskvotur uttan at tryggja sær, at løgtingið tekur undir við hesari avtaluni.

Sambandsflokkurin heldnr ikki, tað er rætt, at løgtingið gevur rættin frá sær til eina nevnd, sum ikki er løgtingsnevnd, at avgera hvønn politikk, løgtingið skal føra á fiskivinnuøkinum.

Viðgerðin av hesum máli hevur verið óvanlig. Fiskivinnunevndin hevur verið við til fundir við teir ymsu áhugabólkarnar. Viðgerðin av sjálvum málinum hevur ikki verið fyrr enn 10. februar. Í meðan hevði javnaðarflokkurin sett ein bólk av fýra tinglimum at arbeiða við uppskotinum, (hetta sjalvt um teir áttu landsstýrismannin í fiskivinnumálum og tvey umboð í fiskivinnunevndini), og frætt hevur verið um nógvar fundir í hesum bólki, eins og í meirilutanum í fiskivinnunevndini og í samgonguni um hetta mál, so vit, ið ikki hoyra til samgonguna, kenna okkum at verða settar uttan fyri viðgerðina av málinum.

Sambandsflokkurin eigur ongan lut í teimum avtalum, har landsstýrið hevur bundið seg til at seta egnar handilskvotur í gildi.

Fiskivinnan sum heild tekur ikki undir við hesari skipan.

Tá málið var til 1. viðgerð í løgtinginum, fekk tað heldur ikki undirtøku í tinginum.

Eingin ivi er um, at veiðitrýstið hevur verið ov høgt og fyri at minka um hetta, eru ávis tiltøk sett í verk. Hesum tiltøkum hevur sambandsflokkurin í høvuðsheitinum tikið undir við. Nevnast kunnu minking av fiskiskipunum við at lata upphøggingarstuðul, økisfriðingar, meskaviddir, legudagar, ungfiskafriðingar og gýtingarfriðingar. Eisini eru skip farin út úr flotanum av fíggjarligum trupulleikum.

Í 1990, meðan sambandsflokkurin sat í samgongu, varð samtykt og lýst lóg um ráfiskabýti, sum skuldi virka frá 1. januar 1991. (Hesa lóg avtóku javnaðar- og fólkaflokkurin, so hon slapp ongatíð at virka.)

Í hesi lóg var fyriskipað, hvussu ráfiskurin skuldi býtast millum flakavirkini út frá søguligum tølum, og um henda lóg hevði verið í gildi, so hevði saneringin av flakavirkjunum og arbeiðsfordeildingin kring landið sæð heilt øðrvísi út, enn tær gera í dag.

Í hesi lóg var eisini sett ein mest loyvda veiða, sum fyri 1991 skuldi í mesta lagi vera 95% av tí, veitt varð árið fyri.

Hetta vísir, at sambandsflokkurin vil vera við til eisini at nýta hægst loyvdu veiðu fyri at fara skynsamiliga um okkara fiskastovnar.

Men vit halda, at hetta er nakað vit sjálvir skulu finna útav, og sum ikki skal kroystast niður yvir okkum aðrastaðir fra.

Náttúruviðurskiftini hava utlan iva stóra ávirkan á fiskagongdina við Føroyar. Seinastu árini hava hesar umstøður verið kargar fyri fiskameingið - serliga fyri tosk og hýsu.

Ávís tekin eru um, at náttúruviðurskiftini eru batnandi.

Samanumtikið skuldu umstøðurnar hjá fiskastovnunum at menna seg aftur verið betraðar.

Sambandsflokkurin tekur ikki undir við lógaruppskotinum frá landsstýrinum um vinnuligan fiskiskap.

Ásannandi, at hetta uppskot er ein avleiðing av avtalunum millum landsstýrið og ríkisstjórnina, mælir sambandsflokkurin til, at landsstýrið tekur upp nýggjar samráðingar við donsku stjórnina og setir tí fram soljóðandi

II Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka upp nýggjar samráðingar við donsku ríkisstjórnina.

Hesar samráðingar eiga at geva landsstýrinum størri virkisfrælsi í til at finna skilagóðar loysnir í fiskivinnumálum, har partarnir í fiskivinnuni eiga at vera við í tilrættisleggingini av fiskivinnuni.

Eisini eigur arbeiðsloysisskipanin at verða tikin við í hesar samráðingar, so møguleikarnir fyri loysnum ikki vera so fastlæstir sum nu.

Fyri at fara betri um toska- og hýsustovnin hevur sambandsflokkurin ta áskoðan, at rímiligt hevði verið at veitt hesi fiskasløg fyrst og fremst við húki. Tá hesi fiskasløg fyri tað mesta halda til á grynri vatni enn 200 m, heldur flokkurin, at økið innan fyri hesa dýpdarlinju á ytru landleiðini eigur at verða avlagt til húkaveiðu.

Á henda hátt verður veiðuflotin í tveimum høvuðsbólkum, tær smærru eindirnar, sum fiska við reiðskapi, ið ikki er førur fyri at koma fiskastovnunum í týningarvanda, og sum gevur møguleika fyri góðari góðsku, sum uppiber eitt høgt útflutningsvirði, og sum ikki órógvar gróðurin á botninum.

Á ytru leiðunum verða tað stórar eindir, sum fiska við effektivum reiðskapi og fáa stórar nøgdir, sum geva nógv arbeiði á landi.
Út frá hesum setir sambandsflokkurin fram soljóðandi

III Uppskot

til

samtyktar

Økið á ytru landleiðini innanfyri 200 m dýpdarlinjuna verður avlagt til húkaveiðu. Undantøk kunnu gerast fyri veiðu eftir fiski og skeljadýrum, sum ikki kunnu veiðast við húki.

Ilin triði minnilutin (Niels Pauli Danielsen) hevur hesar viðmerkingar:

Síðan Atli Dam og Jógvan Sundstein, fyrrv. løgmaður og fyrrv. landsstýrismaður í tíggjarmálum, vóru í Keypmannahavn og bundu Føroya landsstýri til eina avtalu við donsku stjórnina hin 6. oktober 1992, hava landsstýrisflokkarnir tilsamans verið 4 ferðir í Danmørk eftir nýggjum lánum og gjørt nýggjar avtalur við donsku stjórnina.

Treytin frá danskari síðu fyri at hjálpa føroyingum tíggjarliga hevur hvørja ferð verið ein lemjandi dómur yvir førda politikkin. Tað hevur fingið danir at krevja eina rúgvu av donskum lógum settar í gildi í Føroyum og munandi broytingar í føroyska samfelagsbygnaðinum. Lítt av høvuðskrøvunum frá donsku stjórnini hevur verið at broyta bygnaðin í føroysku fiskivinnuni. Hetta krav kom til sjóndar longu við avtaluni, sum Marita Petersen og Jógvan Sundstein gjørdu í Keypmannahavn hin 1. februar 1993, har tað stendur, at "man har fastlagt en reduktion af antallet af fangstlicenser til partrawlere, stållineskibe og skovltrawlere. Landsstyret fortsætter sit arbejde med fiskerilovgivningen, som sigter mod at tilpasse fangstkapaciteten."

Hildið verður fram:

"Landsstyret nedsætter er stukturudvalg, der inden 1. juli 1993 skal fremkomme med forslag til en nettoreduktion af kapaciteten med henblik på at gøre fiskerierhvervet til et selvbærende erhverv, hvilende bl.a. på det biologiske optimale fangstniveau i farvandet omkring Færøerne og på markedsøkonomiske vilkår."

Landsstýrið hjá Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum bant seg eisini við avtaluni hin 1. februar 1993 til at fylgja álitinum hjá bygnarðarnevndini og "at revidere sin lovgivning i overensstemmelse med udvalgets rådgivning".

Bygnaðarnevndin, ið sett varð við fiskivinnustjóranum í Tinganesi sum formanni og stjóranum á fiskirannsóknarstovuni sum næstformanni, kom við áliti sínum til ásettu tíð (1. juli 1993).

Hetta álit legði ikki upp til nakra minking av fiskiflotanum, sum avtalan frá 1. ferbuar 1993 talar um ("reduktion af kapaciteten"), og tað ber harumframt illa saman við og kann sigast ganga beinleiðis ímóti setninginum, nevndin fekk frá landsstýrinum at arbeiða eftir um, hvussu vit "gagnnýta náttúrutilfeingið optimalt og burðardygt undir marknaðarbúskapartreytum" og "rokna út - fyri fleiri samansetingar av veiðuflotanum - avleiðingarnar" fyri búskapin.

Nevndin mælti til, "at talið av veiðiloyvinum ikki verður lækkað niður um tey, sum eru í gildi 1. juli 1993", og segði nevndin seg "ongar grundir hava fyri at mæla til, at fiskiflotin verður broytur meira móti troling ella húkaveiðu."

Í staðin skjýtur bygnaðarnevndin upp at fara undir egnar handilskvotur.

Tað er ikki óhugsandi, at lítla samsvarið millum álitið hjá bygnaðarnevndini øðrumegin og avtaluna við danir 1. februar og arbeiðssetningin hjá nevndini hinumegin hevur sína grund í, at nýtt landsstýri tok við hin 24. apríl, sum hevur givið nevndini nýggj "signalir". Hvørji ið hesi "signalini" voru, sæst á avtaluni, nýggja landsstýrið hjá Tjóðveldisflokkinum, Sjálvstýrisflokkinum og Javnaðarflokkinum gjørdi við donsku stjórnina hin 12. oktober 1993.

Har stendur at lesa um ráðini frá bygnaðarnevndini, at: "Landsstyret har tilsluttet sig anbefalingerne fra Strukturudvalget om fiskerierhvervet og fremsætter i overensstemmelse hermed lovforslag om omsættelige fangstkvoter med virkning fra 1. januar 1994." Nýggja landsstýrið tekur sostatt av fullum huga beinanvegin undir við uppskotinum hjá bygnaðarnevndini um handilskvotur, sjálvt um nakrir av samgongutingmonnunum lótust at vera ímóti og talaðu um "úlv, ið gongur leysur" og skrivaðu í bløðunum um "úlv í seyðaskinni". Tá ið avtalan við donsku stjórnina við 17 atkvøðum varð samtykt í løgtinginum, atkvøddu hesir somu samgongutingmenn tí fyri umsetiligu handilskvotunum, meðan eingin í andstøðuni tók undir við avtaluni.

Tað eru serliga treytirnar í avtaluni frá 12. oktober 1994 um skerjingar í inntøkutrygdini hjá fiskimonnum og umlegging av fiskivinnuni til umsetiliga kvotuskipan, sum býður ímóti, og sum eingin í vinnuni tekur undir við.

Uppskotið hjá landsstýrinum um at skerja inntøkutrygdina hjá fiskimonnum liggur í fiskivinnunevndini, og setir minnilutin (Niels Pauli Danielsen) fram uppskot um, at tað fellur burtur.

IV Uppskot

til

samtyktar

Eingin broyting verður gjørd í lógini um minstuløn, dagsstudning og minstaforvinning, sum minkar um inntøkutrygdina hjá fiskimonnum, løgtingsmál nr. 17/1993.

Eftir at samgongumeirilutin í fiskivinnunevndini hevur broytt kvotuuppskotið hjá landsstýrinum og knýtt kvoturnar til skipini heldur enn til persónar og feløg, komu umboð fyri bankarnar á fund og mæltu frá at gera hetta, tí at tað vil taka umsetiligheitina burtur og scinka tillagingina í flotanum.

Seinasti fundurin í fiskivinnunevndini var við bygnaðarnevndina, har fiskivinnustjórin segði uppskotið hjá meirilutanum framvegis vera handilskvotur, sjalvt um kvotan er knýtt at skipinum, tí at skipini kunnu seljast, men ein meiri stirvin og tungur formur fyri handilskvotur. Á hesum sama fundi segði stjórin á fiskirannsóknarstovuni tað ikki bera til at umsita eina skipan, ið vinnan ikki góðtók.

Meirilutalimirnir í fiskivinnunevndini hava kallað uppskotið hjá landsstýrinum fyri "makkverk", og landsstýrismenn hava verið endurgivnir fyri at kalla broytingarnar hjá meirilutanum í fiskivinnunevndini fyri tað sama ("makkverk").

Tá ið vinnan øll er ímóti kvotuskipanini, bankarnir ráða frá at taka undir við uppskotiuum hjá meirilutanum í fiskivinnunevndini, og samgongumeirilutin sjálvur heldur tað vera "sera óheppið at skula gera so grundleggjandi broytingar í slíkum skundi" og "tað vera so gott sum onga kunning farna fram ..... hvørki fyri fiski- og útróðrarmonnum ella tingmonnum", tí at tíðin er ov knøpp, so man eingin her á landi vera í iva um, at bestu hyggjuráðini eru at stegða við at samtykkja eitt tílíkt lógaruppskot, sum uppskotið um vinnuligan fiskiskap, sum sjálvur formaðurin í fiskivinnunevnd løgtingsins hevur sagt hava størri týdning enn broytingarnar í stýrisskipannarlógini.

Tað verður sagt, at landskassin er komin í peninganeyð, og at danska stjórnin ikki vil leggja út fyri lán, sum eru fallin og falla til gjaldingar, fyrrenn treytirnar í avtaluni frá 12. oktober um handilskvotur eru hildnar. Talan er um japanska lánið upp á 180 mió. kr., sum fall til gjaldingar fyrst í árinum, og tvey lánsgjøld, sum falla til gjaldingar í mars. Landsbankastjórin hevur víst á, at landskassin er skralltómur nú hálvan februar.

Heldur enn at lata stjórnina og danska fíggjarmálaráðharran Mogens Lykketoft noyða okkum inn undir eina fiskivinnuskipan, sum eingin her í landinum tekur undir við, eiga vit at koma við einum mótspæli til donsku stjórnina og biðja um nýggjar samráðingar, tí at tað er so nógv, sum haltar í búskapi okkara og treingir til at vera umlagt. Sethúsaskuldin upp á 5,5 mia. kr., skuldin hjá kommununum upp á 1,7 mia. kr. Arbeiðsloysisskipanin, forsorgarhjálpin v.m.

Føroyingar eiga sjalvir at vera við til at byggja landið uppaftur, sjálvt um vit í dag eru rendir um koll og, sum danska blaðið Kristeligt Dagblad sigur hin 5. februar, "formelt stadig har hjemmestyre, men i praksis er landsstyret og lagtinget sat under administration af Danmark. Det viser sagerne om fiskekvoterne og a-kasseordningen med al ønskelig tydelighed."

Vit eiga allir sum ein at mótmæla, at kvotuskipanin verður smoygd yvir høvdið á okkum í tí líki, sum landsstýrið og meirilutin í fiskivinnunevndini skjóta upp.

Tí setir minnilutin (Niels Pauli Danielsen) fram soljóðandi

V U p p s k o t

til

samtyktar

Landsstýrið biður beinanvegin um nýggjar samráðingar við donsku stjórnina fyri at sleppa undan treytunum í avtaluni frá 12. oktober 1994 um handilskvotuskipan frá 1. januar 1994 og skerjingar í inntøkutrygdini hjá fiskimonnum, sum skuldu verið avgreiddar, áðrenn 1993 var komið at enda.

Í hesum samráðingum verður eisini lagt upp til at loysa lánstrupulleikarnar hjá sethúsaeigarum, skuldina hjá kommununum, støðuna hjá arbeiðisloysisskipanini, forsorgarhjálpini og útvega fígging til nýggjar

vinnuíløgur, sum kunnu minka um arbeiðisloysið og fólkaflytingina úr Føroyum.

Á fundinum við fiskivinnunevndina søgdu umboð fyri bankarnar, at tað kom at hava óhepnar avleiðingar fyri virksemið bæði á sjógvi og landi, um kvoturnar, sum skotið er upp, kunnu ikki setast í veð. Hetta fer at gera tað ómøguligt at fíggja skipini, varð sagt, og flyta uppaftur meira av arbeiði úr Føroyum, tí at útlendingar tá kunnu bjóða seg fram fyri at fáa fiskin. Eisini upplýstu umboðini fyri bankarnar, at talið av partrolarum var ov stórt og kanska lemmatrolarum eisini.

Tað skerst ikki burtur, at trýstið á fiskastovnarnar er komið við teirri nógvu trolingini, ið verið hevur og framvegis er á Føroyagrunninum.

Tí verður neyðugt at minka um talið á trolarum, serliga partrolarum. Hetta vil skapa nakað av arbeiðisloysi millum fiskimenn, sum kann verða loyst á tann hátt, at lagt verður um til húkaveiðu, sum krevur meiri fólk, samstundis sum tey størri skipini verða stuðlað til veiðu eftir fiskasløgum, sum í dag verður gjørt lítið við, so sum svartkjaft til matna, ið norðmenn gera, gullaksi, morafiski, hávasløg á Hatton Bank, kongafiski í Irmingarhavinum v.m..

Víst kann verða til royndirnar í Íslandi at geva húkabátum 150 tons hvørja ferð trolari fær 100 tons.

Neyðugt verður tí at økja um játtanina á fíggjarlógini til praktiskar fiskiroyndir, sum er sett til 6,5 mió. kr. Hetta vil forða nakað fyri arbeiðisloysi, og vil tað samtíðis verða við til at økja um útflutning Føroya og menna fiskivinnuna.

Tí verður sett fram soljóðandi

VI U p p s k o t

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýri og fíggjarnevnd um at hækka játtanina til praktiskar fiskiroyndir.

Til tess at økja um arbeiðispláss á sjónum eins væl og á landi er tað rætt, at játtanin á fíggjarlógini til arbeiðsskapandi tiltøk upp á 25 mió. kr. verður latin til vinnufeløgini at fyrisita eftir reglum, sum landsstýri og løgting áseta.

Tí verður sett fram soljóðandi

VII Uppskot

til

samtyktar

Føroya Løgting heitir á landsstýrið um at lata játtanina til arbeiðsskapandi tiltøk á fíggjarlógini fyri 1994 til vinnufeløgini at fyrisita eftir ásettum reglum frá landsstýrinum og arbeiðaramálanevnd løgtingsins.

Varð lurtað eftir kendum útróðrarmonnum og feløgunum á útróðrarplássunum sum Klaksvík, Leirvík o.ø., høvdu vit neyvan verið komnir í so ringa støðu, sum vit nú eru komnir í viðvíkjandi fiskastovnunum, serliga toski og hýsu. Náttúran ger síut, men tað harða veiðitrýstið man eisini gera sítt til at minka um fiskastovnin.

Í hesum sambandi kann verða vist til uppskotið hjá Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og fiskivinnuflokki, um hvíld sunnu- og halgidagar, ið tíverri ikki fekk nóg stóra undirtøku á tingi. Fyrireikingar verða gjørdar til at seta hetta uppskot fram aftur í øðrum líki.

Ístaðin fyri kvotuskipan, sum aðrastaðir sigst hava ført til, at nógvur fiskur verður blakaður út aftur, kann verða vist á skipan við fiskidagatali og á skipan við avmarkaðum tali av størri skipum, ið kunnu fiska frítt á djúpum vatni.

At gýtingarleiðirnar norðanfyri og vestanfyri eru friðaðar verjir toska- og hýsustovnin, men at opna tær stóru gýtingarleiðirnar hjá upsanum eysturi í Holinum í kassa E fyri trolarum, sum gjørt varð fyrst í árinum, man fáa mangan ein at standa og spyrja, hvat ið meiningiu er. Tí var tað væl skiljandi, tá ið umboð fyri reiðarafelagið á fundi í fiskivinnunevndini um kvotuskipanina segði seg nú stúra fyri upsastovninum, eftir at Holið var opnað fyri troiveiðu gýtingarmánaðirnar februar/mars. Veiðan hjá trolarunum eysturi í Holinum júst í hesum døgum av stórum upsa, sum er komin hagar fyri at gýta, tykist geva honum rætt.

Minnilutin (Niels Pauli Danielsen) tekur undir við útróðrarfeløgunum, at tað er óneyðugt bæði við friðing móti húki, ið ikki hóttir nakran fiskastovn, og við kvotuskipan fyri teir bátar, ið royna við húki. Tvørturímóti kann ein sovorðin illa umhugsað skipan sum tann, landsstýrið og meirilutin í fiskivinnunevndini skjóta upp, gerast ein stórur meinbogi fyri teir, ið rógva út við línu og snellu, tí at so lítið verður í part, og tí at teir koma at liggja fleiri dagar av árinum.

Útróðrarbátarnir hava sum er onga aðra vinnu at leita til. Teir skulu fiska av eini felags kvotu saman við skipum, sum hava serloyvi til veiðu undir Íslandi, uppi í Barentshavinum, á Føroya Banka og trolbátunum, ið eru 13 í tali og hava fingið heili 6,5% av mest loyvdu toska- og hýsuveiðuni (TAC) frábýtt av teimum samlaðu 29% til útróðrarbátar yvir 20 brt.

Orðini hjá fiskivinnustjóranum í fjør um, at útróðrarmenn koma at verða ringast fyri, tykjast nú gerast veruleiki.

Úr arbeiðisloysisskipanini fáa teir sjáldan nakað, minstuløn fáa teir onga við bátum undir 20 brt., og við kvotubýtinum táa teir nú bara loyvi til at fiska nøkur fá tons av toski og hýsu. Soleiðis kann eingin stætt verða viðfarin, sum landsstýrið og meirilutin í fiskivinnunevndini fer við útróðrarmonnunum, fiskimonnunum og fyri ta skuld øllum Føroya fólki.

Tí verður sett fram soljóðandi

VIII Uppskot

til

samtyktar

Útróðrarbátum upp til 110 brt. verður frítt at fiska við húki, lð ongan stovn oyðir.

Minnilutin (Niels Pauli Danielsen) átalar ta løgnu viðgerð, uppskotið um umsetiliga kvotuskipan hevur fingið í fiskivinnunevndini, har tann eini av samgongutlokkunum nærmast tók málið úr nevndini og setti í staðin eina floksnevnd at arbeiða við uppskotinum við undanfarna løgmanni Atla Dam á odda.

Úrslitið er eitt uppskot frá meirilutanum í fiskivinnunevndini, har kvoturnar verða býttar í bólkar og undirbólkar, og tey skipini fáa størstu kvotur, ið hava størstu skuld og minstan aldur. Hesin bólkur fær frammanundan meiri enn aðrir bólkar í fløgustuðuli úr landskassanum umframt stuðulslán, ið verða umløgd til studningslán, sum skulu ikki gjaldast aftur, men verða avskrivað yvir nøkur ár.

Við at knýta kvoturnar til skipið, kemur í veruleikanum tann peningastovnur, ið ræður yvir skipinum, t.d. við at keypa tað á tvingsilssølu, at vera tann, ið býtur kvotur út, tá ið skipið skal seljast aftur. Hetta kunnu vera bankarnir, Realurin ella aðrir lánistovnar, og hetta kann gera tað, at kvoturnar verða savnaðar t.d. í miðøkinum.

Meirilutin í fiskivinnunevndini skjýtur upp at býta kvoturnar til 6 høvuðsbolkar. Tríggir teir fyrstu eita "Stáltrolarar yvir 400 HK, stakir", "stáltrolarar yvir 400 HK, pør" og "stállinuskip yvir 110 brt.". Umboð fyri Skipara- og Navigatørfelagið gjørdi á fundi vart við, at trætrolarar vóru eisini. Hvønn bólk koma hesir í. Eisini gjørdi nevnda umboð vart við viðvíkjandi revsireglunum í kap. 10, § 45, at fiskiveiðieftirlitið eftir uppskotinum kundi bæði skuldseta og taka veiði- og fiskiloyvi frá fari, áðrenn ákæra varð reist og dómur feldur.

Í kap. 3, § 14, verður skotið upp at heimila landsstýrinum at áseta eitt avgjald fyri kvoturættindi fyri hvørt fiskiár sær. Føroya Fiskimannafelag upplýsti á fundi í fiskivinnunevndini, at í Íslandi verður 30% av veiðivirðinum latið sum kvotuavgjald.

Tað er ikki vist, at landsstýrið hugsar um at taka so nógv í avgjaldi frá tí føroyska veiðiflotanum, sum frammanundan er illa fyri sum alt annað í Føroyum í dag, men tá ið hugsað verður um peningatrotið hjá landskassanum, veit eingin, hvat ið henda kann. Avgjøld verða løgd á mest sum alt, sjálvt navnabroytingar.

Minnilutin (Niels Pauli Danielsen) átalar eisini, at fiskivinnufeløgini ikki sluppu at síggja álitið hjá fiskivinnunevndini, áðrenn tað varð lagt fram, sum Føroya Fiskimannafelag bað um. Tað hevði verið betri, um vinnan varð tikin meira við upp á ráð og sjálv slapp at býta kvoturnar, um so er, at løgtingið boyggir seg fyri danska kravinum og politikki landsstýrisins.

Minnilutin (Niels Pauli Danielsen) harmast at enda, at landsstýrið og meirilutin í fiskivinnunevndini fara longur enn bygnaðarnevndin fór í áliti síuum í fjør og longur enn avtalan við donsku stjórnina frá 12. oktober 1993 fer, tá ið skotið verður upp í endamálsgreinini, at lógin um vinnuligan fiskiskap skal galda hæði fyri tilfeingið á føroysku landleiðini og hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi á sjólciðum uttan fyri føroysku landleiðirnar.

Minnilutin (Niels Pauli Danielsen) heldur tað hevði sømt seg betur, um meirilutin í fiskivinnunevndini og landsstýrið heldur enn í skundi at troka eina handilskvotuskipan fgjøgnum, sum eingin í landinum tekur undir við, sjálvt tók og legði frá sær og skrivaði út nýval.

Tí verður loksins sett fram soljóðandi

IX Uppskot

til

samtyktar

Føroya løgting samtykkir at skriva út nýval beinanvegin.

2. viðgerð 25. februar 1994. Broytingaruppskot frá meirilutanum í fiskivinnunevndini samtykt við 17-0 atkvøðum.

28. februar 1994 legði Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður vegna seg sjálvan og løgtingsmenninar Flemming Mikkelsen, Svend Aage Ellfsen og Jógvan Sundstein fram soljóðandi

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð

§ 49 í uppskoti landsstýrisins verður orðað soleiðis:	§ 49 i landsstyrets forslag affattes således:
"§ 49. Hetta lógaruppskot verður sent	"§ 49. Dette lovforslag forelægges Færøer-

Føroya fólki til fólkaatkvøðu. Vísir úrslitið meiriluta fyri lógini, verður landsstýrinum heimilað við kunngerð at seta hesa lóg í gildi beinanvegin eftir fólkaatkvøðuna."

nes befolkning til folkeafstemning. Såfremt resultatet udviser et flertal for loven, bemyndiges Færøernes landsstyre til ved bekendtgørelse at sætte loven i kraft umiddelbart efter folkeafstemningen."

28. februar 1994 legði ein meiriluti í fiskivinnunevndini (Heini O. Heinesen, Jógvan A. Johannessen, Henrik Old og Karl Heri Joensen) fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

3. viðgerð

Meirilutin í fiskivinnunevndini (Heini O. Heinesen, Jógvan A.Johannessen, Henrik Old og Karl Heri Joensen) vísir á, at sambært reglunum í grein 9 er bann fyri at blaka veiðu út. Meirilutin hevur á síðu 19 í álitinum mælt til, hvussu søluprísur av slíkari veiðu verður býttur, men meirilutin mælir til at broyta hetta soleiðis: Til veiðufar og manning: 5% undir galdandi upsaprísi í meðal seinasta ársfjórðing á teimum av landsstýrinum góðkendu uppboðssølunum. Restin av søluvirðinum verður býtt við 1/4 til grunnin fyri óarbeiðsførar fiskimenn og 3/4 til ein eftirlønargrunn fyri fiskmenn yvir 60 ár. Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna umsitur grunnin og stýrið fyri lønjavningargrunnin ger reglugerð fyri grunnin, við góðkenning landsstýrisins.

Meirilutin mælir eisini til, at stállínuskip yvir 110 BRT ikki skulu fiska innanfyri 6 fjórðingar úr grundlinjunum.

Meirilutin mælir til, sum fráboðað varð undir 2. viðgerð av málinum, at gera nakrar broytingar í lógaruppskotinum.

Sum meirilutin skrivaði í álitinum, er tekin til, at tær lívfrøðiligu umstøðurnar siggja út til at vera betri í ár enn tær hava verið undanfarin ár. Nýggjar stovnsmetingar fyriliggja í juni 1994. Hesar nýggju metingar verða so viðgjørdar eftir § 22 í lógaruppskotinum, so at løgtingið fær neyvari metingar og kann áseta kvotur fyri komandi fiskiár frá 1. september 1994 til 31. august 1995 í august í ár. Út frá hesum mælir meirilutin til, at kvotur í lógini verða settar fyri tíðina frá gildiskomu lógarinnar fram til 31. august 1994 og mælt verður tí til at gera broytingar í § 22 og § 27 samsvarandi hesum.

Meirilutin mælir til at broyta prosentbýtið fyri tosk, hýsu og upsa í § 28, stk. 2. Toskur verður býttur soleiðis millum skipabólkarnar: Bólkur 1 fær 4%, bólkur 2 fær 21%, bólkur 3 fær 23%, bólkur 4 fær 27%, bólkur 5 fær 24% og bólkur 6 fær 1%. Fyri hýsu verður býtið broytt fyri bólkarnar 2, 3 og 4, soleiðis, at bólkur 2 fær 10,25%, bólkur 3 fær 28% og bólkur 4 fær 28%, meðan býtið fyri hinar bólkarnar verður óbroytt. Fyri upsa verður býtið broytt soleiðis, at bólkur 1 fær 13%, bólkur 2 fær 70%, bólkur 4 fær 10% og bólkur 5 fær 7%.

Við hesum broytingum verður eisini neyðugt at broyta býtislykilin í § 29, stk. 1, punkt 1 og 2 samsvarandi broytingunum í § 28, stk. 2. Meirilutin mælir eisini til, at broyta punkt 4 í hesi grein soleiðis, at fyri trolbátarnar í staðin fyri ein ávísan prosentpart av kvotuni, verður ásett fast tonsatal av toski og hýsu. Mælt verður til, at trolbátarnir í bólki 4 fáa 70 tons av toski og 30 tons av hýsu árliga. Eisini mælir meirilutin til at broyta orðingina í stk. 3 viðvíkjandi býtinum av ónýttum kvotum.

Í § 33, stk. 2 stendur, at fiskiveiðieftirlitið á sjónum er samansett av skipum frá føroyska fiskiveiðieftirlitinum og flogførum og eftirlitsskipum frá donsku sjóverjuni. Meirilutin mælir til, at orðini "føroyska fiskiveiðieftirlitinum" verður broytt til "Vaktar- og Bjargingartænastuni".

Í §§ 40 og 48 eru tvær smáar prentvillur, sum neyðugt verður at broyta. Eisini mælir meirilutin til í § 49 at broyta gildiskomu lógarinnar til dagin eftir, at lógin er kunngjørd.

Samsvarandi hesum setir meirilutin (Heini O. Heinesen, Jógvan A. Johannessen, Henrik Old og Karl Heri Joensen) til 3. viðgerð av tingmáli nr. 51/1993: Løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1) § 22, stk. 4 verður strikað.
2) § 27 verður soljóðandi:
"Heildarkvotur á landleiðunum fyri fiskifør undir føroyskum flaggi verða ásettar fyri hesar fiskastovnar fyri tíðarskeiðið frá gildiskomu lógarinnar til 31. august 1994.

Tons rund vekt:

Toskur á landgrunninum	3.400
Toskur á Føroya Banka	700
Hýsa	3.000
Upsi	20.750
Kongafiskur	6.650

Stk. 2. Heildarkvotur komandi fiskiárið frá 1. september 1994 verða ásettar sambært reglunum í § 22."
3) § 28. stk. 2. verður orðað soleiðis:
"Felags kvotupartarnir verða roknaðir hvørjum bólki sær. Tá lógin fær gildi verður prosentbýtið av teimum ymisku fiskastovnunum soleiðis:

1) § 22, stk. 4 slettes.
2) § 27 formuleres således:
"Totalkvoter på fiskeriterritoriet for fiskefartøjer under færøsk flag fastsættes for disse fiskebestande for tidsrummet fra lovens ikrafttrædelse til 31. august 1994.

Tons, rund vægt:

Torsk på landsokkelen	3.400
Torsk på Føroya Banka	700
Kuller	3.000
Sej	20.750
Rødfisk	6.650

Stk. 2. Totalkvoter for det kommende fiskeriår fra 1. september 1994 fastsættes i henhold til reglerne i § 22."

3) § 28, stk. 2 formuleres således:
"Fælles kvoteandele beregnes for hver individuel gruppe. Når loven træder i kraft fastsættes procentfordelingen af de forskellige fiskebestande således:

	Toskur Tosk	Hýsa Kuller	Upsi Sej	Kongafiskur Rødfisk
Bólkur 1: Trol, lemmatrolarar Gruppe 1: Trawl, dørtrawlere	4%	1,75%	13%	89,5%
Bólkur 2: Trol, pør Gruppe 2: Trawl, par	21%	10,25%	70%	8,5%
Bólkur 3: Línuskip Gruppe 3: Lineskibe	23%	28%		1%
Bólkur 4: Útróðrarbátar yvir 20 BRT Gruppe 4: Kystfiskefartøjer over 20 BRT	27%	28%	10%	1%
Bólkur 5: Útróðrarbátar undir 20 BRT Gruppe 5: Kystfiskefartøjer under 20 BRT	24%	30%	7%	
Bólkur 6: Onnur Gruppe 6: Andre	1%	2%		

4) § 29 verður soljóðandi:
"Innanfyri hvønn av bólkunum av fiskiførum í § 28, stk. 1, verður egni kvotuparturin hjá skipi roknaður soleiðis:
1) Bólkur 1 verður skipaður í tríggjar undirbólkar soleiðis:
A: Djúpvatns lemmatrolarar y. 400 BRT, 2100 Hk ella meira.
B: Djúp- og meðalvatns lemmatrolarar u. 400 BRT, 1200 Hk ella meira.
C: Lemmatrolarar u. 400 BRT, minni enn 1200 Hk.
Í bólki A verður tillutað hvørjum skipi av MLV:
Toskur 0,27%, hýsa 0,12%, upsi 0,60%, kongafiskur 8,27%.
Í bólki B verður tillutað hvørjum skipi av MLV:
Toskur 0,27%, hýsa 0,12%, upsi 1,20%, kongafiskur 4,14%.
Í bólki C verður tillutað hvørjum skipi av MLV:
Toskur 0,27%, hýsa 0,12%, upsi 1,20%, kongafiskur 1,88%.
2) Bólkur 2 verður skipaður í tríggjar undirbólkar:
A: Partrolarar størri enn 220 BRT. 1150 Hk ella meira, byggiár 1984 ella

4) § 29 formuleres således:
"Inden for hver af grupperne af fiskefartøjer i § 28, stk. 1, beregnes fartøjets individuelle kvoteandel således:
1) Gruppe 1 deles i tre undergrupper således:
A: Dybvands dørtrawlere o. 400 BRT. 2100 Hk eller mere.
B: Dyb- og mellemvands dørtrawlere u. 400 BRT, 1200 Hk eller mere.
C: Dørtrawlere u. 400 BRT, mindre end 1200 Hk.
I gruppe A tildeles hvert skib af HTF:
Torsk 0,27%, kuller 0,12%, sej 0,60%, rødfisk 8,27%.
I gruppe B tildeles hvert skib af HTF:
Torsk 0.27%, kuller 0,12%, sej 1,20%, rødfisk 4,14%.
I gruppe C tildeles hvert skib af HTF:
Torsk 0,27%, kuller 0.12%, sej 1,20%, rødfisk 1,88%.
2) Gruppe 2 deles i tre undergruppper:
A: Partrawlere større end 220 BRT. 1150 Hk. byggeår 1984 eller senere.
B: Partrawlere o. 200 BRT. 700 Hk eller mere.
C: Partrawlere u. 200 BRT, mindre end 700 Hk.
I gruppe A tildeles hvert skib af HTF:

seinni.
B: Partrolarar y. 200 BRT, 700 Hk ella meira.
C: Partrolarar u. 200 BRT, minni enn 700 Hk.
Í bólki A verður tillutað hvørjum skipi av MLV:
Toskur 0,57%, hýsa 0,28%, upsi 2,50%, kongafiskur 0,25%.
Í bólki B verður tillutað hvørjum skipi av MLV:
Toskur 0.57%, hýsa 0,28%, upsi 1,90%, kongafiskur 0,22%.
Í bólki C verður tillutað hvørjum skippi av MLV:
Toskur 0,57%, hýsa 0,28%, upsi 1,29%, kongafiskur 0,20%.
3) Bólkur 3: Býtt verður javnt ímillum skipini í bólkinum.
4) Bólkur 4 fiskar av felags árskvotu. Fyri útróðrarbátar yvir 20 BRT í bólki 4, sum veiða við troli, verður teirra partur, 70 tons av toski og 30 tons av hýsu, frábýttur.
Um útróðrarbátur leggur um aftur frá troli til línu/snelluveiði, fellur hansara partur inn aftur í bólkin.
5) Bólkur 5 fiskar av felags árskvotu.
6) Fiskitíðin fyri bátar, ið fiska av felagskvotu, verður býtt í trý tíðarskeið:
1: september - desember
2: januar - apríl
3: mai - august.
Tó í 1994 frá mars til august.

Stk. 2. Í fyrsta kvotubýti umfari verður ikki kvota ella kvotupartur tillutaður fiskifari, sum ikki er í vinnu ella møguliga ikki fer í vinnu fyribils. Er vissa fyri, at farið kemur í vinnu rímiligan part av fyrsta fiskiári, útskrivar landsstýrið kvotubræv. Kvota ella partar av kvotu soleiðis ónýttur fellur til hini førini í avvarðandi høvuðsbólki. Henda regla ávirkar ikki fríu umsetiligheitina smb. § 16 annars, tá kvotubræv endaliga er útskrivað.

Torsk 0,57%, kuller 0,28%, sej 2,50%, rødfisk 0,25%.
I gruppe B tildeles hvert skib af HTF: Torsk 0,57%, kuller 0,28%, sej 1,90%, rødfisk 0.22%.
I gruppe C tildeles hvert skib af HTF: Torsk 0.57%, kuller 0,28%, sej 1,29%, rødfisk 0,20%.
3) Gruppe 3: Der fordeles lige mellem skibene i gruppen.
4) Gruppe 4 fisker af fælles årskvote. For kystfiske fartøjer over 20 BRT i gruppe 4, der fisker med trawl, bliver deres andel 70 tons torsk og 30 tons kuller, fradelt. Såfremt kystfiskefartøj igen omlægger fra trawl til line/snelle, falder dennes andel tilbage til gruppen.
5) Gruppe 5 fisker af fælles årskvote.
6) Fisketiden for både, der fisker af fælleskvote, deles i tre perioder:
1: september - december
2: januar - april
3: mai - august.
Dog i 1994 fra marts til august.
Stk. 2. I den første kvotefordeling tildeles ikke kvote eller kvoteandel til fiskefartøj, der ikke er i drift eller muligvis ikke forløbigt optager drift. Er der sikkerhed for, at fartøjet kommer i drift i en rimelig del af det første fiskeriår, udskriver landsstyret kvotebrev. Kvote eller dele af kvote, der således er uudnyttede, tilfalder de andre fartøjer i vedkommende hovedgruppe. Denne bestemmelse påvirker ikke den frie omsættelighed iøvrigt i henhold til § 16, når kvotebrev udskrives endeligt.

Stk. 3. Landsstyret bemyndiges til, når der tre måneder af fiskeriåret resterer at overføre uudnyttede kvoter efter til andre grupper, der har behov for denne kvote, baseret på hensigten i foreliggende".

5) I § 33, stk. 2 ændres "den færøske

Stk. 3. Landsstýrinum verður heimilað, tá triggir mánaðar eru eftir av fiskiárinum, at flyta ónýttar kvotur, til annan bólk, sum tørvar hesa kvotu, grundað á tilætlingina í hesi lóg."

5) Í § 33, stk. 2. verða orðini "føroyska fiskiveiðieftirlitinum" broytt til "Vaktar- og bjargingartænastuni".

6) Í § 40, pkt. 2 verður "§10, stk. 1-6" broytt til "§ 10, stk. 1-5".

7) Í § 48 verður "§ 46" broytt til "§ 45".

8) Í § 49 verða orðini "1. mars 1994" broytt til "dagin eftir, hon er lýst".

fiskerikontrol" til "Vagt- og bjærgningstjenesten".

6) I § 40, pkt. 2 ændres "§ 10, stk. 1-6" til "§ 10. stk. 1-5".

7) I § 48 ændres "§ 46" til "§ 45".

8) I § 49 ændres "1. marts 1994" til "dagen efter, at den er bekendtgjort".

3. viðgerð 4. mars 1994. Broytingaruppskotið frá Tordi J. Niclasen og øðrum fall við 8-0 atkvøðum.

Broytingaruppskotið frá meirilutanum í fiskivinnunevndini við broytingum frá somu endaliga samtykt í staðin fyri uppskot landsstýrisins við 17-8 atkvøðum. Atkvøtt varð við navnakalli.

Lóg nr. 28. frá 10. mars 1994.

52 Viðvíkjandi nevndarvali í P/F Føroya Banka

Týsdagin 15. februar 1994 legði Lasse Klein, løgtingsmaður, vegna seg sjálvan og løgtingsmenninar Sverra Midjord, Niels Paula Danielsen, Karl Hera Joensen, Óla Breckmann, Jógvan við Keldu, Vilhelm Johannesen, Helenu Dam á Neystabø, Finnboga Arge og Jóhannes Ellefsen fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at fíggingargrunnurin frá 1992 velur annan lim í nevndina hjá P/F Føroya Banka í staðin fyri Kjartan Hoydal, fiskivinnustjóra í landsstýrinum, tá hesin má metast inhabilur vegna starvsøki sítt í umsitingini.

Viðmerkingar

Fíggingargrunnurin frá 1992 er í dag umboðaður í nevndini fyri P/F Føroya Banka av Kjartani Hoydal, fiskivinnustjóra í landsumsitingini.

Tað er ikki upplýst, um landsstýrið á fundi hevur givið loyvi til hetta.

Fyri nøkrum árum síðani fekk høgur embætismaður í landsumsitingini áheitan frá banka her um at taka við nevndarsessi. Embætismaðurin legði málið fyri landsstýrisfund og landsstýrið sýtti fyri at loyva embætismanninum nevndarsess í banka vegna habilitetskrøvini til høgan embætismann.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur í blaðviðtal 16. desember 1993 upplýst, at hann einki visti um at fiskivinnustjórin var valdur í bankanevnd, og landsstýrismaðurin ásannar, at hetta kann verða óheppin støða.

Út frá hesum má metast, at landsstýrið ikki hevur viðgjørt spurningin um nevndarsetanina, og tískil er einki loyvi givið.

Um málið hevði verið lagt fyri á landsstýrisfundi, má metast, at tá landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum er ímóti, fellur málið.

At slíkt mál skal á landsstýrisfund er púra greitt, og her fyriliggja fordømi, sum líka greitt grunda sýtan á habilitetin hjá embætismanni.

Kjartan Hoydal umsitur grein 16. grein 18 og partar av grein 19 á fíggjarlógini, og er tí inhabilur at viðgera nakað mál í bankasambandi, sum hevur við nevndu málsøkir at gera.

Kjartan Hoydal, fiskivinnustjóri, hevur fingið beinleiðis áheitan frá fíggingargrunninum 1992

um at gerast limur í nevndini fyri P/F Føroya Banka.

Talan er ikki um, at landsstýrið hevur fingið áheitan um at velja lim, ella um at geva loyvi til, at embætismaður í landsumsitingini verður valdur.

Tað sum Kjartan Hoydal, fiskivinnustjóri, átti at gjørt, og sum hann ikki hevur ómakað sær at gjørt, er at biðja um landsstýrisins loyvi at sita í nevndini fyri P/F Føroya Banka, eins og øll onnur skulu gera.

Tað, at Kjartan Hoydal fer uttan um landsstýrið og tekur av einum slíkum nevndarstarvi sum hesum, eigur ikki at koma fyri, og telur ikki honum til fyrimun, tá talan er um loyala handling mótvegis sínum arbeiðsgevara.

Tí eigur tað at standa Kjartan Hoydal, fiskivinnstjóra, greitt, at hann skal biðja um landsstýrisins/fíggjarnevndarinnar loyvi. Hann fremur eina illoyala handling við ikki at biðja um loyvi, og slíkum embætismonnum hava vit neyvan brúk fyri í landsumsitingini.

Landsstýrið eigur tí at geva fiskivinnustjóranum tvinnar kostir í at velja: annaðhvørt verður hann verandi í starvi sum fiskivinnustjóri, ella tekur hann við starvinum sum nevndarlimur í P/F Føroya Banka. Hann kann ikki velja bæði. Í hesum máli finst eingin millumloysn.

1. viðgerð 23. februar 1994. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 25. februar 1994. Málið varð beint í rættarnevndina. Burturdottið vegna samgonguslit.

53 Broyting í løgtingslóg um toll

Ár 1993, leygardagin 18. desember legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um toll.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 8 verður sum nýtt stk. 7 sett: "
"**Stk. 7.** Regluligt uttanlands ferðamanna- ella farmasamband kann bert setast á stovn við loyvi frá Toll- og Skattstovuni."

2) Í § 13 verður sum nýtt stk. 6 sett:
"**Stk. 6.** Toll- og Skattstova Føroya kann krevja trygd frá skipaavgreiðslum og øðrum flutningsfeløgum fyri toll og avgjøld á vørum, ið verða útflýggjaðar uttan loyvi frá Toll- og Skattstovuni."

3) Í § 21 verður sum nýtt stk. 2 sett:
"**Stk. 2.** Føroya Gjaldstova fremur tollpanting."

4) Aftaná § 28 verður sum § 28 a sett:
"**§ 28 a.** Føroya Landsstýri ásetur reglur um, í hvønn mun og undir hvørjum treytum skip og flogfør kunnu taka við og proviantera toll- og avgjaldsfrían proviant og aðrar neyðsynjarvørur at nýta umborð ella at selja til ferðafólk."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring af lagtingslov om told.

§ 1.

I lagtingslov nr. 121 af 23. december 1991 om told med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 8 indsættes som nyt stk. 7:
"**Stk. 7.** Regelmæssig udenlands passager- og fragtforbindelse kan kun oprettes med Toll- og Skattstovens tilladelse."

2) I § 13 indsættes som nyt stk. 6:
"**Stk. 6.** Toll- og Skattstova Føroya kan forlange sikkerhed fra skibsselskaber og andre transportselskaber for told og afgifter af varer, der udleveres uden Toll- og Skattstovens tilladelse."

3) I § 21 indsættes som nyt stk. 2.:
"**Stk. 2.** Føroya Gjaldstova foretager udpantning af told."

4) Efter § 28 indsættes som § 28 a:
"**§ 28 a.** Føroya Landsstýri fastsætter regler om, hvorvidt samt i hvilket omfang og på hvilke vilkår skibe og fly kan medføre og proviantere told- og afgiftsfri proviant og andre fornødenheder til brug om bord eller til salg til passagerer."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Hetta uppskot landsstýrisins til broyting í løgtingslóg um toll er uppskot um at fáa til vega

neyðugar heimildir í tolllógini sum grundarlag fyri ásetan av reglum til at fyrisita lógina eftir og tekniskar tillagingar av lógini.

Talan er m.a. um at skapa heimild fyri reglum um toll- og avgjaldsfría proviantering til skip og flogfør, samstundis sum somu viðurskifti eisini skulu regulerast við neyvari reglum í mun til meirvirðisgjaldslógina. Her er talan um at fáa galdandi mannagongd á tolløkinum samskipaða við reglurnar í meirvirðisgjaldslógini.

Heimild verður eisini givin Toll- og Skattstovuni at krevja trygd stillaða av flutningsfeløgum fyri møguligum krøvum, ið kunnu standast mótvegis flutningsfeløgunum, m.a. vegna útflýggjan av ikki tollgreiddum vørum.

Eisini verður mett neyðugt, at regluligt uttanlands ferðamanna- ella farmasamband bert verður sett á stovn við loyvi frá Toll- og Skattstovuni, so hesin stovnur kann tryggja sær, at eftirlitsviðurskiftini kunnu vera klár og røkjast so skjótt sum farleiðin fer í gongd.

Viðmerkjast skal, at 1) og 2) eru heimildir, ið vóru í gomlu tolllógini, men sum av eini ella aðrari orsøk ikki komu við í nýggju tolllógina.

1. viðgerð 28. desember 1993. Málið varð beint í skattanevndina, sum 26. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstrinum tann 18. december 1993 og eftir 1. viðgerð 28. december 1993 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur ein samd nevnd samtykt vegna eina skrivivillu, har tað er komið at standa "stk. 7" í staðin fyri "stk. 2", at seta fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Í § 1, nr. 1, verður "stk. 7" og "Stk. 7" broytt til ávikavist: "stk. 2" og "Stk. 2".	I § 1, nr. 1, ændres "stk. 7" og "Stk. 7" til henholdsvis: "stk. 2" og "Stk. 2".

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Lasse Klein, Jacob Lindenskov, Heini O. Heinesen og Finnbogi Arge) tekur annars undir við uppskotinum og mælir til at samtykkja tað.

Ein minniluti (Svend Aage Ellefsen) tekur ikki undir við nr. 1 í uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 27. apríl 1994. Broytingaruppskotið samtykt við 17-0 atkvøðum.

3. viðgerð 28. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

Lóg nr. 60 frá 10. mai 1994.

54 Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald

Ár 1993, leygardagin 18. desember legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, stk. 3, litra h, verður orðað soleiðis: "Útleiga, uppsiting og umsiting av fastari ogn. Tó er útleiga av camping-, parkerings- og reklamuplássi o.t. avgjaldsskyldugt."
2) § 12, stk. 3, verður strikað, og stk. 4-7 verða framyvir stk. 3-6.
3) § 16, stk. 3, litra e, verður orðað soleiðis: "Umboðan og gávum."
4) Í § 16, stk. 3 verður sum nýtt litra f sett:
   "Útvegan og rakstri av persónakførum, sum er gjørdur til flutning av hægst 9 persónum."
5) § 22, stk. 2, verður orðað soleiðis:
   "**Stk. 2.** Verður avgjaldið ikki goldið til tíðina, skal 1,5% gjaldast í mánaðarligari rentu fyri hvønn byrjaðan mánaða frá og við gjaldsmánaðinum at rokna, tó í

lagtingslov om ændring i lagtingslov om meromsætningsafgift.

§ 1.

I lagtingslov nr. 136 af 8. september 1992 om meromsætningsafgift med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 2, stk. 3, litra h, affattes således:
   "Udlejning, bortforpagtning og administration af fast ejendom. Afgiftspligtig er dog udlejning af camping-, parkerings- og reklameplads."
2) § 12, stk. 3 udgår, og stk. 4-7 bliver herefter stk. 3-6.
3) § 16, stk. 3, litra e, affattes således:
   "Repræsentation og gaver".
4) I § 16, stk. 3 indsættes som nyt litra f:
   "Anskaffelse og drift af personmotorkøretøjer, der er indrettet til befordring af ikke mere end 9 personer."
5) § 22, stk. 2 affattes således:
   "**Stk. 2.** Betales afgiften ikke rettidigt, skal der betales 1,5% i månedlig rente for hver påbegyndt

minsta lagi 100 kr. fyri eitt avgjaldstíðarskeið. Renta verður somuleiðis goldin av hækkingini av avgjaldinum sambært § 21, stk. 1 fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjaldsmánaðinum at rokna."

6) Í § 27 verður sum nýtt stk. 9 sett:
"**Stk. 9.** Bøkur, ið hoyra undir vøruflokk 4901 í toll- og vøruskránni kunnu innflytast avgjaldsfrítt."

7) Aftaná § 36 verður sum § 36 a sett:
"**§ 36 a.** Landsstýrið ásetur reglur um, at avgjald kann afturrindast avgjaldsskyldugum virkjum, ið ikki hava bústað e.t. her á landi, sum er goldið her fyri vørur og avgjaldsskyldugar tænastur til vinnuliga nýtslu hjá virkjum her á landi.
Stk. 2. Afturrindan av avgjaldi sambært stk. 1 kann bert verða veitt fyri innkeyp av tí slagnum, sum skrásett virki kunnu rokna við í inngangandi avgjald sambært reglunum í §§ 15 og 16."

§ 2

Henda løgtingslóg fær gildi 1. januar 1994.

måned fra og med forfaldsmåneden at regne, dog mindst 100 kr. for en afgiftsperiode. Rente skal ligeledes betales af forhøjelsen i henhold til § 21, stk. 1 for hver påbegyndt måned fra og med forfaldsmåneden at regne."

6) I § 27 indsættes som nyt stk. 9:
"**Stk. 9.** Bøger, der hører under told-og varefortegnelsens position 4901, kan indføres afgiftsfrit."

7) Efter § 36 indsættes som § 36 a:
"**§ 36 a.** Landsstyret fastsætter bestemmelser, hvorefter der kan ydes afgiftspligtige virksomheder, der ikke er etableret her i landet, tilbagebetaling af den afgift, som er betalt her for varer og afgiftspligtige ydelser til virksomhedernes erhvervsmæssige brug her i landet.
Stk. 2. Tilbagebetaling af afgift efter stk. 1 kan kun ydes for indkøb af den art, som registrerede virksomheder kan medregne til den indgående afgift efter bestemmelserne i §§ 15 og 16."

§ 2

Denne lagtingslov træder i kraft 1. januar 1994.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins til broytingar í meirvirðisgjaldslógini viðvíkja:

broyting nr. 1) og 2)	útleigan av kamari
broyting nr. 3)	umboðan og gávur
broyting nr. 4)	bilar
broyting nr. 5)	rentur
broyting nr. 6)	bøkur
broyting nr. 7)	afturrindan til útlendsk virki

1) og 2) útleigan av kamari:
Útleigan av kamari á gistingarhúsum og á virkjum hevur verið meirvirðisgjaldsskyldugt tó so, at útlendingar hava verið undantiknir.

Landsstýrið metir, at rættast er, at bæði útlendingar og føroyingar verða settir javnt, hvat hesum spurningi viðvíkur, og verður tí skotið upp, at meirvirðisgjald ikki verður kravt fyri gisting. Henda lógarbroyting førir sostatt við sær, at eingin, hvørki útlendingar ella føroyingar, skal gjalda meirvirðisgjald fyri gisting.

3) Umboðan og gávur:
Henda lógarbroyting førir við sær, at útreiðslur í sambandi við umboðan ikki kunnu dragast frá í meirvirðisroknskapinum. Sum dømi um hesa reglu kunnu útreiðslur til handilsmáltíðir ikki roknast við í inngangandi avgjald. Harumframt er tað nær sagt ógjørligt løgfrøðiligt at skilja ímillum, nær ein lutur er ein "gáva" ella "umboðan".

4) Bilar:
Tá ið virki keypa persónbil, uttan mun til um bilurin verður brúktur heilt ella lutvíst í virkinum, verður hereftir eingin frádráttur fyri meirvirðisgjaldi av útveganini ella rakstrinum.

Hetta er galdandi uttan mun til vinnuligu nýtsluna av persónbilinum. Tó verður framvegis møguleiki at fáa fullan ella lutfalsligan frádrátt fyri bilar yvir 3500 kg.

Neyvari reglur hesum viðvíkjandi verða gjørdar í kunngerð um lutfalsligan frádráttarrætt.

5) Rentur:
Broytingin í rentunum er gjørd so, at rentuhátturin skal verða eins fyri toll, skatt og meirvirðisgjald.

6) Bøkur:
Henda lógarbroytingin førir við sær, at bøkur kunnu innflytast avgjaldsfrítt, eins og bøkur eru tað við sølu.

Prenting av bókum í Føroyum er meirvirðisgjaldsskyldug, meðan innflutningurin av somu bókum er meirvirðisgjaldsfrír. Hetta førir við sær, at bókaútgevarar skulu gjalda MVG, tá ið teir fáa prentaðar bøkur í Føroyum, og síðani draga meirvirðisgjaldið frá í roknskapinum. Um bókin verður prentað uttanlands, skal einki meirvirðisgjald áleggjast.

7) Afturrindan til útlendsk virki:
Hetta uppískoyti í lógina er neyðugt til tess at skapa heimild til afturrindan av meirvirðisgjaldi til útlendsk skrásett virki, ið keypa meirvirðisgjaldsskyldugar vørur og tænastur her á landi.

Neyvari reglur hesum viðvíkjandi verða gjørdar í kunngerð um afturrindan av meirvirðisgjaldi til útlendsk virki.

1. viðgerð 28. desember 1993. Málið varð beint í skattanevndina, sum 21. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. desember 1993 og eftir 1. viðgerð 28. december 1993 beint í skattanevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við hesi felag: Sølu- og Marknaðarfelag Føroya, Føroya Reiðarafelag, Føroya Prentsmiðjufelag og umboð fyri bilhandlarafelagið.

Nevndin ásannar, at MVG-gjaldið hevur darvað handverks-, ídnaðar-, framleiðslu- og tænastuvinnuni í ov stóran mun, og metir tí at neyðugt er, at landsstýrið tekur spurningin viðvíkjandi MVG á tænastu- og framleiðslu upp til nýggja viðgerð.

Avgjaldið á MVG er í løtuni 25% av avgjaldsskyldugu søluni, og nevndir metir, at landsstýrið eigur at taka mvg-avgjaldið upp til nýggja viðgerð við tí endamáli at lækka avgjaldið frá 1. januar 1995.

Nevndin mælir frá at gera broytingar í § 1, pkt. 3, 4 og 6, men **er samd** um í hesum umfarinum at seta fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Í § 1 í uppskoti landsstýrisins verða gjørdar hesar broytingar:
§ 12, stk. 1, litra h, verður orðað soleiðis:
"Søla av tíðindabløðum og prenting fyri tíðindabløð."

I § 1 i landsstyrets forslag foretages følgende ændringer:
§ 12, stk. 1, litra h, affattes således:
"Salg af aviser og trykning for aviser."

Skattanevndin hevur eisini havt til viðgerðar spurningin um at strika meirvirðisgjaldið av sølu av heilivági sambært resept, sum er útskrivað av lækna.

Í hesum sambandi hevur nevndin havt fund við setta landsapotekaran, Hera Mortensen. Hann upplýsti, at sølan av heilivági er skipað soleiðis, at tað er ógjørligt at skilja millum teir ymsu heilivágirnar, og var sannførdur um, at tað bar ikki til at umsita eina tílíka skipan soleiðis, sum sølan í dag er skipað, at taka partar av heilivágnum burtur úr og gera hann meirvirðisgjaldsfrían.

Hin vegin hevur nevndin viðgjørt spurningin um at lækka meirvirðisgjaldið á heilivági í sfni heild. Undir viðgerðini hevur nevndin fingið kunnleika um, at landsstýrið arbeiðir við spurninginum og kemur seinni í ár við frágreiðing um m.a. hesi viðurskifti. Nevndin er tí sumd um at geva landsstýrinum møguleika at koma við frágreiðingini og fer, tá frágreiðingin er komin, at taka spurningin upp til nýggja viðgerð.

Undir viðgerðini hevur nevndin viðgjørt støðuna hjá føroyskum heimavirkjum, sum selja lutir fyri fólk og/ella limir sínar.

Heimavirkini hava gjørt vart við tað órímiliga í tí, at tey fólkini, sum virka lutir til sølu í heimavirkjum, keypa tilfarið í handlum og gjalda meirvirðisgjald av tí. Umframt hetta verður meirvirðisgjald lagt oman á søluprísin, tá vøran verður seld í útsølu, t.v.s. at vøran gerst órímiliga dýr í útsølu í mun til aðrar vørur.

Nevndin er sannførd um, at skulu vit varðveita heimavirkini og birta upp undir arbeiðsskapandi tiltøk, so er neyðugt at gera ávísar broytingar soleiðis, at hædd verður tikin fyri virkseminum hjá heimavirkjunum og teimum fólkum, sum lata teimum vøru, og er hetta orsøkin til, at nevndin setir fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at koma við eini broyting til meirvirðisgjaldslógina, sum tekur hædd fyri virkseminum hjá føroyskum heimavirkjum, og at leggja uppskot á ting um hesi viðurskifti skjótast gjørligt ella í seinasta lagi á ólavsøku 1994.

Nevndin er samd um at neyðugt er at fremja lættar á øðrum økjum eisini, og tí mælir nevndin landsstýrinum til at broyta kunngerð nr. 7 frá 27. januar 1992 um toll-, innflutnings- og avgjaldssatsir og mælir til, at lágorkuperur, sum hava eitt punktgjald upp á 30% verður strikað, og kemur tí við hesum:

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at broyta kunngerð nr. 7 frá 27. januar 1992 um toll- og innflutnings- og avgjaldssatsir og seta vørunummar 8539.22.00 til "0".

2. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskot landsstýrisins, nr. 1-2 samtykt við 28-0, nr. 3 fall við 0, nr. 4-5 samtykt við 28-0, nr. 6 fall við 0, nr. 7 samtykt við 28-0, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. Broytingaruppskot frá skattanevndini samtykt við 28-0.

Til 3. viðgerð av málinum setti skattanevdin fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

2)	Í § 12 verður skoytt upp í litra k: "salt".	2)	Til § 12, litra k tilføres: "salt".

3) Í § 27 verður skoytt upp í sum nýtt stk. 9: "salt".	3) I § 27 indsættes som nyt stk. 9: "salt".

3. viðgerð 28. apríl 1994. Broytingaruppskot til 3. viðgerð samtykt við 25-0 atkvøðum, lógin soleiðis broytt samtykt við 26-0 atkvøðum. Uppskotini til samtyktar samtykt við ávikavist 23-0 og 27-0 atkvøðum.

Lóg nr. 81 frá 25. mai 1994.

55 Regulering av fiskiskapinum á NAFO-økinum í 1994

Ár 1993, leygardagin 18. desember legði løgmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið tekur til eftirtektar samtyktina á NAFO-ársfundinum í september 1993 um regulering av fiskiskapinum í sáttmálaøkinum í 1994.

Viðmerkingar:

15. ársfundurin í NAFO varð hildin í døgunum 6. - 10. september 1993 í Dorthmouth, Kanada, um regulering av fiskiskapinum á sáttmálaøkinum í 1994.

Øll limalondini vóru umboðað, og eins og undanfarnu ár vóru fundir samstundis hildnir í ráðgevandi nevndini og fiskivinnunevndini. Harafttrat vóru teir vanligu fundirnir hildnir í teimum teknisku undirnevndunum.

Tað eydnaðist at fáa semju millum Kanada og EES um fiskiskapin á Bretonhellingini, har í roynd og veru verður fiskibann í 1994. Sostatt sleppst undan tí gamla stríðnum millum hesi

bæði lond, sum tarnaði NAFO og hinum limalondunum so nógv árini 1985-1990.

Toskurin á Flemish Cap í 1994.
Hóast sera ringu støðuna í hesum stovni fekst somja um eina avmarkaða niðurgongd í kvotuni frá 12.965 til 11.000 tons. Føroyar løgdu dent á, at hóast fiskifrøðingarnir hava rátt til, at øll beinleiðis veiða eftir toski á Flemish Cap átti at verið bannað í 1994, so er tað, sum hevur størsta týdning, at forða verður skipum at veiða fisk undir minstamátinum 41 cm.

Føroyski parturin av hesi kvotu í 1994 verður 2.461 tons móti 2.999 tonsum í 1993.

Rækjur á Flemish Cap.
Í góðum samstarvi við Noreg, Russland, Grønland og Ísland eydnaðist tað at fáa eina rímiliga skipan fyri rækjurnar á Flemish Cap.

Denturin varð lagdur á, at hjávciðan í rækjuveiðuni ikki skuldi hótta botnfiskastovnarnar í økinum.

Frá 1. januar 1994 er ásett at nýta skiljirist. Fyribils er ásett, at í mesta lagi 28 mm skal vera millum rimarnar. Eygleiðaraskipanin verður at nýta til øll skip við í minsta lagi 10% av fiskidøgunum í 1993. Skipanin er sett í verk og heldur fram í 1994.

Hjáveiðireglan er, at skipini flyta í minsta lagi 5 fjórðingar, um hjávciðan fer upp um 10% í vekt fyri hvørt hál.

Tað verður bert loyvt at nýta rækjutrol innan fyri Flemish Cap á Grand Bank inn móti kanadiska 200 fjórðinga markinum í 1994 við skiljirist fyri ikki at veiða eftir øðrum botnfiskasløgum við smámcskaðum troli.

Svartkalvavciðan heldur áfram í 1994 og er eingin kvota ásett fyri henda stovn.

1. viðgerð 28. desember 1993. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 4. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. desember 1993 og eftir 1. viðgerð 28. december 1993 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og **ein samd nevnd** mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 21. mars 1994. Málið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

FL jnr. 1581-15/90.

56 Skipan millum Føroyar og Litavia um sínámillum fiskirættindi í 1994

Ár 1993, leygardagin 18. desember legði løgmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til
samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið hjáløgdu avtalu frá 17. november 1993 millum Føroyar og Litavia um sínámillum fiskirættindi í 1994.

Viðmerkingar:

Fundarsemjan frá samráðingunum við Litavia er hjáløgd.

TAC'ið fyri tosk í Eystursjónum í 1994 er økt 50% sammett við 1993, og er nú 60.000 tons. TAC'ið var í 1993 40.000 tons og í 1992 100.000 tons. Samlaða toskakvotan hjá Litavia í 1994 er 2.670 tons.

Føroyska sendinevndin legði fram uppskot um, at føroyska toskakvotan fór upp samsvarandi økingini í TAC-num. Litaviska sendinevndin førdi fram, at bert eitt felag nýtir svartkjaftakvotuna, og ynskti, at støðið í sáttmálanum fór niður í helvt.

Laksakvotan er uppgjørd í fiskum, og vektin á hvørjum fiski er sett til 5 kg. Føroyska kvotan varð sett niður í helvt, 7,5 tons, ið svarar til 1.500 stk.

Orðing varð sett í avtaluna um, at einki uppskot er um toskabann í litaviskum sjógvi í 1994.

Ein grein er um, at partarnir vilja virka fyri samstarvi millum vinnuna hjá báðum londunum.

Niðanfyri er yvirlit, ið vísir litavisku og føroysku kvoturnar í 1992, 1993 og 1994. Talið av føroyskum fiskiloyvum er sett niður úr 8 í 6.

Litaviskar kvotur í føroyskum sjógvi (tons).

	1992	1993	1994
Svartkjaftur	6.000	10.000	5.500

Føroyskar kvotur í litaviskum sjógvi (tons).

	1992	1993	1994
Toskur	500	380	200
Laksur	10	15	1.000 stk.
Síld	200	2.000	1.000
Brislingur	0	3.000	1.500

1. viðgerð 28. desember 1993. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 4. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. desember 1993 og eftir 1. viðgerð 28. desember 1993 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og **ein samd nevnd** mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 21. mars 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

FL jnr. 1555-14/92.

57 Samráðingar við ES um treytir fyri limaskapi

Ár 1993, leygardagin 18. desember legði Edmund Joensen, løgtingsmaður, vegna sambandsflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt ígjøgnum ríkisstjórnina at taka upp samráðingar við ES (Europeiska Samveldið) um treytir fyri møguligum føroyskum limaskapi.

Viðmerkingar:

Tey stóru norðurlondini: Svørîki, Noreg og Finland hava saman við flestu av teimum EFTA-londunum, sum eftir eru, Schweiz og Eysturríki, søkt um limaskap í ES.

Danmark, sum vit eru partur av, gjørdist sum kunnugt limur í 1973. Flestu eru á einum máli

um, at hesin limaskapurin er beinleiðis orsøkin til, at landið er búskaparliga best fyri av Norðurlondum. Hetta er eisini beinleiðis orsøkin til, at stjórnirnar í hinum norðurlondum nú vilja fylgja Danmark eftir og gerast limir.

Eitt sanit Føroya Løgting avgjørdi í 1973, at Føroyar skuldu ikki fara upp í saman við Danmørk. Eingin ivi er um, at hetta var ein røtt avgerð tá.

Ræsurnar at fiska vóru rúmar; hetta var áðrenn sjómørkini vórðu sett út á 200 sjómíl. Marknaðarlondini hjá Føroyum vóru flestu uttan fyri ES: Norðurlond, onnur EFTA-lond, saltfiskalondini fyri sunnan, t.d. Spania og Portugal umframt at Danmark var verandi sum heimamarknaður at rokna - aldargomlu rættindini hildu fram Danmarkar og Føroya ímillum.

Eftir øllum sólarmerkjum at døma verða tað bert Grønland, Ísland og Føroyar, sum fara at standa uttan fyri eitt sameint Europa. Hetta er sera hættisligt. Hesi trý londini eiga framvegis at hava eitt tætt samarbeiði, men vit eiga ikki at gloyma, at vit hava stórliga brúk fyri okkara umheimi. Føroyski búskapurin er vorðin meira og meira tengdur at londunum í ES. Eru vit ikki á varðhaldi, er stórur vandi fyri, at vit avbyrgja okkum úti í Atlantshavi, meira enn vit nakrantíð ætlaðu.

Tað, sum vit í norðurlondum hava til felags, er okkara søga, mál og mentan. Hetta eiga vit av øllum alvi at verja, varðveita og menna m.a. í Norðurlandaráðnum.

Handilsavtalan við ES

1. januar 1992 kom í gildi nýggj handilsavtala millum Føroyar og EF.

Undir viðgerðini av løgtingsmáli nr. 13/1991 førdi sambandsflokkurin fram, at avtalan ikki stóð mát við tað, sum roknað var við frammanundan.

Víst var á, at flokkurin gekk inn fyri eini avtalu, sum fór at menna tað føroyska samfelagið, og ikki øvugt.

Í minnilutauppskotinum førdi umboð sambandsfloksins fram millum annað:

1) Vinnulívsmenn høvdu víst á, at hundraðtals arbeiðspláss fóru at hvørva.
2) Føroyar mistu Danmark sum heimamarknað.
3) Avtalan forðaði okkum í at keypa og virka ávøru úr triðjalondum og selja vøruna á ES - marknaðinum í kapping við aðrar.
4) Avtalan fevndi um kvotur og loft, sum komu at forða fyri teirri menning av okkara samfelag, sum ætlanin var við eini frihandilsavtalu.

Sambandsflokkurin segði tá, at henda avtalan á ongan hátt kundi metast sum eitt líðugt úrslit.

men í besta føri sum eitt stutt stig á leiðini fram ímóti eini endaligari loysn. Flokkurin setti sum treyt fyri at atkvøða fyri, at løgtingið samtykti uppskot um at fyrireika eitt nærri samstarv við ES, enn handilsavtalan bar í sær.

Hetta uppskotið til samtyktar fall, og tí atkvøddi flokkurin ikki fyri handilsavtaluni.

Tíðin er komin at kanna treytirnar

Tað er nógv sum týðir uppá, at tað fer at vera sera ivasamt, um vit føroyingar í tíðini, sum kemur, verða førir fyri at halda ein rímiligan livifót við tí tilfeingi, sum vit hava til taks eftir tær avmarkingar, ið okkum hava verið fyri seinastu árini.

Hóast teir fyrimunir, vit hava havt á ES-marknaðinum, ein stuðul úr Danmark upp á eina slaka milliard um árið, og hóast vit hava gingið okkara fiskigrunnum so nær, at vit hava niðurfiskað stovnarnar, so er okkara samfelag komið upp í rasshaft við eini nettouttanlandsskuld upp á 9 milliardir kr., sum vit ikki síggja okkum nakran útveg fyri at kunna greiða. Alt okkara vinnulív hevur so trongar umstøður, at tað ikki sær nakran møguleika fyri at kunna yvirliva.

Tann stóri ES-marknaðurin verður nú latin aftur fyri londum, sum ikki eru limir. Hetta hevur sum nevnt ført við sær, at flestu EFTA-londini hava viðurkent, at tey eru ov smá og veik til at standa uttanfyri og hava tí søkt um limaskap.

Sjálvt um vit standa uttanfyri ES, verða vit noydd at laga okkum eftir fleiri og fleiri av teirra reglum. Vit hava fingið GATT-toll og meirvirðisgjald. Vinnulívslógirnar, sum vit við seinastu bankakreppuni pliktaðu okkum at seta í gildi fyri Føroyar, eru eisini í samsvari við galdandi ES-krøv o.s.fr.

Tað er ein sannroynd, at av øllum Norðurlondum er tað EF-landið Danmark, sum hevur mest positivu búskaparligu gongdina. Svøríki, Finnland og Noreg viðurkenna, at teir hava ongan møguleika at venda skeivu búskapargongdini uttan at gerast limir í felagsskapinum. Teir vóru eisini greiðir um, at tað hevði skund at fáa samráðingar í lag, áðrenn spurningurin um limaskap fyri tey mongu Eysturlondini fer at gerast aktuellur. Hetta er eisini nakað, sum vit eiga at hava fyri eyga, tí tað er ikki sjálvsagt, at vit kunnu koma uppí, tá ið tað lystir okkum.

Okkara størsta vandamál í løtuni er at endurreisa føroyska búskapin. Øll eru samd um, at tað verður ikki gjørt einans við tí tilfeingi, sum okkara egnu skip kunnu veiða. Roknað verður við, at eini 500.000 tons av fiski streyma inn í Europa úr triðjalondum. Hesin fiskur kemur ofta langvegisfrá sum fryst vøra, ið skal viðgerast og góðskast, áðrenn hon fer víðari til brúkaran. Vóru vit limir í ES, kundu vit útvegað okkum rávøru í fríari kapping við onnur limalond, góðska hana, og síðani selt ta lidnu vøruna innan felagsskapin.

Um vit á henda hátt fingu gongd á útflutningin, høvdu vit eisini fingið bøtt um arbeiðs-

loysisspurningin. Hetta er okkara besti møguleiki at basa arbeiðsloysinum. Men núverandi liðugtvørutøllur er ein forðing fyri hesum, og hetta er ein av vansunum við at standa uttan fyri LS. Tey, sum halda, at hetta kortini letur seg gera, taka stórliga feil. Ætlanin við tollinum er júst at forða fyri sølu.
Fiskidnaðinum má standa í boði henda møguleika, so hann gerst meira støðugur og minni viðkvæmur enn nú, tá bert heimasjógvurin er at líta á. Tá verða arbeiðsplássini tryggari, og keyparin av tí lidnu vøruni fær betri trygd fyri at fáa hana til ásettu tíðina.

Okkara alivinna er í stórum trupulleikum. Vit eru í stórum vanda fyri ikki at sleppa av við laksin, tá ið marknaðurin ofta er undir trýsti, og gerst m.o. íond Noreg limur í ES, er marknaðurin mettaður støðugt, og verður sostatt stongdur fyri okkum.

Samráðingar við ES um treytirnar fyri møguligum limaskapi høvdu m.a. avdúkað, um Føroyar høvdu fingið atgongd til størri fiskiøki og hin vegin, hvussu treytirnar høvdu verið viðvíkjandi okkara egna øki. Hetta verður cyðsæð cin avgerandi táttur í okkara endaligu støðutakan til limaskap.

1. viðgerð 18. januar 1994. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 22. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av sambandsflokkinum tann 18. december 1993 og eftir 1. viðgerð 18. januar 1994 beint í marknaðarnevndina.

Mælt verður í uppskotinum frá sambandsflokkinum til, at álagt verður landsstýrinum og ríkisstjórnini at taka upp samráðingar við ES um treytir fyri limaskapi.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fleiri fundum í marknaðarnevndini saman við fulltrúum í landsstýrinum og saman við umboðum fyri Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Fiskimannafelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Reiðarafelag, Føroya Handverkarafelag, Føroya Handverksmeistarafelag, P/F Marr & Co., Føroya Fiskavirking og Føroya Fiskasølu.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Hergeir Nielsen, Vilhelm Johannesen, Heini Johansen og Helena Dam á Neystabø) vísir á, at í handilsavtaluni millum ES og Føroyar í § 34 stendur, at eftir áheitan úr Føroyum fer felagsskapurin at umhugsa at betra møguleikan fyri atgongd fyri ávísum vørum.

Haraftrat er ein yvirlýsing um, at felagsskapurin, tá nýggjar semjur ella fyriskipanir millum felagsskapin og limaíondini í EFTA-londunum sømdir út um tær, sum veittar eru Føroyum á økjum, sum hesin sáttmáli fevnir um, fer felagsskapurin eftir áheitan úr Føroyum við

vælvild at umhugsa í hvørjum einstøkum føri, í hvønn mun og á hvørjum grundarlagi, samsvarandi sømdir kundu verið veittar Føroyum.

Landsstýrið roynir í hesum døgum tann her nevnda menningarklausulin eins og EFTA-klausulin fyri at vita, hvørji virði liggja í hesum.

Marknaðarnevndin er kunnað um, at hóast seint gongur, so eru ávís framstig gjørd, men eru hesar samráðingar tó ikki at enda komnar enn. Eisini varð upplýst, at umboð fyri vinnulívið, ið var við í hesum samráðingum, vóru nøgd við gongdina í málinum.

Nevndin er kunnað frá vinnufeløgunum, og serliga útflutningsvinnuni um, at tað, at vit ikki hava tollfrælsi inn á ES-marknaðin, virkar sera darvandi fyri alt føroyskt vinnulív, og tað er ein avgerandi treyt fyri okkara kappingarføri, at góð atgongd er til ES-marknaðin. Marknaðaratgongdin hjá føroyskum virkjum er ikki nóg góð í dag, og arbeiðast eigur fyri at fáa frægari tollfyrimunir.

Tað finnast fleiri aðrir mátar at knýta okkum at ES-marknaðinum, t.d. við eini tollsamgongu, og víst verður á, at løgtingið hevur tikið støðu fyri, at Grønland, Ísland og Føroyar seta eina felags embætismannanevnd til at kanna, hvørjir møguleikar liggja í einari felags tollsamgongu við ES.

Endurreisingarnevnd landsstýrisins sigur í sínum áliti frá 25. januar 1994, at triðjalandsfiskur í framtíðini fær alstóran týdning fyri búskapin, og at rátt verður til at kanna, um Føroyar hava møguleika fyri at koma í tollsamgongu við ES.

Nevndin vísir á, at lond við ávísum sjálvstýri, sum ikki eru limir í ES, eru Isle of Man, kanaloyggjarnar, San Marino og Andorra, og hava hesi lond tollsamgongu við ES.

Í einari tollsamgongu veita londini hvørt øðrum fult tollfrælsi, eins og tey avtaka allar handilsforðingar. Ein tollsamgonga hevur somu toilgjøld á vørum uttaneftir, meðan vørumar sínámillum eru undantiknar tolli. Hetta ber í sær, at er ein vøra uttaneftir komin inn um tollmarkið í einum ES-landi, hevur hon frítt at fara í øllum ES uttan aðra tollforðing, og í eini tollsamgongu eiga ikki at vera trupulleikar við upprunareglum.

Isle of Man og tær sonevndu kanaloyggjarnar hava tollskipan saman við Bretlandi, og hetta hevur verið galdandi í longri tíð, og síðani 1973 hava tær verið ein partur av tollsamgonguni hjá ES.

Smálondini Andorra og San Marino hava, hóast tey eru umgyrd av ES-londum eins og Isle of Man, nágreiniligar serskipanir móti ES. Hesi smálondini hótta tó ikki á nakran hátt onnur øki í ES, so sum ES vil verða við, at Føroyar og føroyskar vørur gera.

Tí er tað ivasamt, um ES hevur áhuga í at gera tollavtalu við eini fiskivinnutjóð, í og við at fiskivinnan í ES verður uppfatað sum ein viðkvom vinna.

Skuldu Føroyar fingið eina tollsmgongu við ES, so er tað hugsandi, at hesir tættir verða viðgjørdir í teirri embætisnevnd, sum fer undir hetta arbeiðið.

ES hevur annars ein hóp av serskipanum við onnur lond, sum á ein ella annan hátt eru knýtt at einum ES-landi. Nevnast kunnu seravtalur fyri tær kanarisku oyggjarnar, tey bæði smáu sponsku umráðini við marokkansku strondina, Ceuta og Melilla. ES-limasáttmálin hjá Portugal fevnir eisini um Azorurnar og Madeira, sum sjálvstøðugir landspartar í portugisiska ríkinum. Serskipanir eru eisini fyri fronsku umráðini handan hav - Guayana, Réunion, Guatelupe og Martinique.

Nevnast kann, at Kyrpos, Turkaland og Malta hava biðið um limaskap eftir einari assosieringsskipan, men at ynski frá hesum limalondum um limaskap higartil hevur verið noktað av ES.

Eisini finnast sokallaðar OLT-skipanir, sum eru galdandi fyri lond og umráði handan hav, sum annars hava tætt samband við ES-limalond. Eitt nú er Grønland umfatað av tílíkari avtalu, eins og onnur øki og lond, ið Bretland, Frakland og Holland hava eithvørt ræði á, eru tað.

EBS-avtalan, sum EFTA-londini fingu, ger, at hesi verða limað inn í innmarknaðin hjá ES, eitt slag av einum limaskapsforgarði í ES, har karmurin fevnir um, at vørur, kapitalur, arbeiðsmegi og tænastur, at tey EFTA-londini, sum hava fingið eina EBS-avtalu, øll hava søkt um limaskap í ES, og verður støða tikin til hendan seinni á árinum.

Stutt kann sigast um EBS-avtalurnar, at tær hava allar teir fyrimunir og vansar, sum limaskapur hevur, men at EBS-londini onga beinleiðis politiska ávirkan hava.

Vísandi til frammanfyri nevndu avtaluhættir, heldur meirilutin, at talan er um eitt stórmál, og at ikki er rætt, nú meðan landsstýrið er í samráðingum, at áleggja landsstýrinum at taka samráðingar upp um limaskapsmøguleikar í ES, tí tá er longu avgerð í forhond tikin um, at tað er limaskapi, miðað verður eftir.

Serliga er at hava í huga ta oljuvinnu, sum vit eru farin undir á seismiska økinum, og sum eftir øllum dømum fer at taka seg upp á føroyskum sjóøki. Her er av serligum og avgerandi týdningi fyri alla framtíð Føroya, at skynsamiliga verður farið fram til gagns fyri eftirkomarar okkara, og at vit ikki enda í tí óføri, sum
eitt nú hetlendingar endaðu í, har teir eiga alt, men fáa einki.

Av serligum týdningi er í hesum sambandi at nevna oljudirektivið í ES, sum setir øll limalondini, antin tey eiga ráevni ella ikki, á jøvnumføti verkliga, búskaparliga og arbeiðsliga.

Meirlutin í marknaðarnevndini mælir frá, so sum samskifti okkara og samskiftismøguleikar okkara við ES síggja út í løtuni, at taka undir við uppskoti sambandsfloksins, og setir einki uppskot fram.

Ein annar minniluti (Jógvan Sundstein og Birgir Danielsen) setir fram hetta

u p p s k o t

til

samtyktar

Sett verður skjóttarbeiðandi nevnd til útgreining av møguligum alternativum uppskotum til skipanir Føroya og ES ímillum.

Høvuðsendamálið við eini nýggjari skipan er at veita føroyska útflutninginum (allar vørur og tænastur) tollfría atgongd til Europeiska Samveldið.

Viðmerkingar:

Uppskotið hjá sambandsflokkinum snýr seg um at taka upp samráðingar um limaskap. Tað vanliga er, at tá tað verður gjørt, so er støðan tikin til, at vit vilja gerast limir. So langt eru vit ikki komin enn.

Vit eru kunnug við ymsar skipanir millum smærri lond og ES (t.d. Isle of Man, Kanaloyggjarnar, Kanaricoyggjarnar o.s.fr.), sum geva víðar tollrøsur, uttan at londini eru beinleiðis limir. Skipanirnar eru ymiskar.

Ein møgulig komandi oljuvinna eigur at verða tikin við í metingarnar.

Núverandi handilsavtala gevur ikki nóg rúmar røsur orsakað av kvotum, tollloftum, umsitingini av minstu- og referancuprísskipanini v.m.

Okkara kappingarføri er álvarsliga darvað. Hetta er galdandi fyri bæði núverandi og ætlaðan framtíðar framleiðslustruktur.

Kannað eigur eisini at verða, hvat árin ein møgulig nýggj skipan kann koma at hava á samfelagið.

Løgtingið eigur at taka støðu til møguleikarnar og síðan geva landsstýrinum mandat til at samráðast um ta valdu loysnina.

Ein minniluti (Edmund Joensen) tekur undir við uppskotinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið fall við 5-0 atkvøðum. Uppskotið frá minnilutanum í marknaðarnevndini fall við 6-0 atkvøðum.

58 Betran av kappingarførinum

Ár 1993, leygardagin 18. desember legði Edmund Joensen, løgtingsmaður, vegna sambandsflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at seta nevnd at dagføra álit frá arbeiðsbólkinum til at kanna avleiðingarnar av eini lønar- og skattalækking.

Viðmerkingar

Flestu fiskaðarlond í vesturheiminum viðurkenna, at tey eru í vanda fyri at missa sína arbeiðspláss, tí onnur lond fegin vilja yvirtaka teirra framleiðslu og fyri ein væl minni kostnað.

Føroyar hava vesturlendskt met í arbeiðsloysi, og búskaparstøðan er katastrofal.

Tí er alneyðugt, at alt, sum gerast kann til tess at bøta um hesi viðurskifti, verður gjørt alt fyri eitt.

6. oktober 1989 setti táverandi landsstýri, sum var fólkaflokkurin, sambandsflokkurin og tjóðveldisflokkurin ein arbeiðsbólk til at kanna avleiðingarnar av eini lønar- og skattalækking.

Í bólkinum vórðu hesir valdir:

Petur Alberg Lamhauge, stjóri á Líkningarráð Føroyar, formaður,
Jógvan Joensen, statsgóðkendur grannskoðari,
Christian Andreasen, advokatur
Bjarni Olsen, stjóri á Hagdeildini,
Sigurd Poulsen, stjóri á Landsbanka Føroya.

Setningurin hjá bólkinum var: at kanna avleiðingarnar av, at allar lønir verða lækkaðar við einum prosenti sum t.d. 5%, 10%, 20%, 25% og 30%, samstundis sum øll lønarhækkingin í krónum verður mótroknað í skattinum.

Møguliga skuldi bólkurin kanna hægri % eisini - skotið verður upp, at somu persónar verða aftur valdir í bólkin. Bólkurin varð biðin um at svara hesum spurningum:

1) Hvør verður ávirkanin á vinnulívið, landskassan og kommunukassarnar?

2) Hvussu ávirkar skipanin skattahámarkið?

og

3) Hvørjar verða avleiðingarnar annars á samfelagsbúskapin sum heild.

Niðurstøðan í álitinum, sum nevndin gjørdi, dagf. 23. apríl 1990, er, at lønarniðurseting bert er ráðilig at fremja, um so er, at arbeiðsloysi er í landinum.

Tess størri lønarniðursetingin er, tess størri má arbeiðsloysið vera.

Arbeiðsloysi var nærum einki tá, og tí var tað ikki rætta løtan, varð hildið.

Nú kann so eingin ivi vera um, at fyritreytirnar eru til staðar.

Landsstýrið verður tí biðið um at arbeiða skjótt við kanningini, so røttu tiltøkini kunnu verða framd, sum lækka kostnaðarstøðið og betra um kappingarførið í føroyska samfelagnum.

1. viðgerð 20. januar 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 12. aprtl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av sambandsflokkinum tann 18. december 1993 og eftir 1. viðgerð 20. januar 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

Málið varð ikki liðugt viðgjørt vegna samgonguslit.

59 Skipan millum Føroyar og Lettland um sínámillum fiskirættindi í 1994

Ár 1993, leygardagin 18. desember legði løgmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið hjáløgdu avtalu frá 16. november 1993 millum Føroyar og Lettland um sínámillum fiskirættindi í 1994.

Viðmerkingar:

Fundarsemjan frá samráðingunum við Lettland er hjáløgd.

TAC'ið fyri tosk í Eystursjónum í 1994 er økt 50% sammett við 1993, og er nú 60.000 tons. TAC'ið var í 1993 40.000 tons og í 1992 100.000 tons. Samlaða toskakvotan hjá Lettlandi í 1994 er 4.060 tons.

Føroyska sendinevndin legði fram uppskot um at føroyska toskakvotan fór upp samsvarandi økingina í TAC-num. Lettland kundi í mesta lagi veita 700 tons av toski, og er hetta 17% av teirra kvotu og 7 ferðir so nógv sum EF fær í lettiskum sjógvi. Javnvág varð funnin við síld og brislingi, og lettiska svartkjaftakvotan øktist til 14.000 tons.

Laksakvotan er uppgjørd í fiskum, og vektin á hvørjum fiski er sett til 5 kg. Við hesum svara 30 tons til 6.000 stk.

Orðing varð sett í avtaluna um at einki uppskot er um toskabann í lettiskum sjógvi í 1994.

Ein grein er um at partarnir vilja virka fyri samstarvi millum vinnuna hjá báðum londunum.

Niðanfyri er yvirlit, ið vísir lettisku og føroysku kvoturnar í 1992, 1993 og 1994. Talið av fiskiloyvum er óbroytt.

Lettiskar kvotur í føroyskum sjógvi (tons).

	1992	1993	1994
Svartkjaftur	12.000	12.000	14.000

Føroyskar kvotur í lettiskum sjógvi (tons).

	1992	1993	1994
Toskur	1.000	600	700
Laksur	20	30	6.000 stk.
Sild	500	2.000	3.000
Brislingur	0	2.000	3.000

1. viðgerð 28. desember 1993. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 4. mars 1994 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. desember 1993 og eftir 1. viðgerð 28. december 1993 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og **ein samd nevnd** mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 21. mars 1994. Málið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

FL jnr. 1555-13/90.

60 Skipan millum Føroya og Estland um sínámillum fiskirætindi í 1994

Ár 1993, leygardagin 18. desember legði løgmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið hjáløgdu avtalu frá 15. november 1993 millum Føroyar og Estland um sínámillum fiskirættindi í 1994.

Viðmerkingar:

Fundarsemjan frá samráðingunum við Estland er hjáløgd.

TAC'ið fyri tosk í Eystursjónum í 1994 er økt 50% sammett við 1993, og er nú 60.000 tons. TAC'ið var í 1993 40.000 tons og í 1992 100.000 tons. Samlaða toskakvotan hjá Estlandi í 1994 er 1.070 tons.

Føroyska sendinevndin legði fram uppskot um at føroyska toskakvotan fór upp samsvarandi økingina í TAC-num, men Estland var ikki ført fyri at lata so stóran part av kvotuni. Vegna ringu búskaparligu støðuna í løtuni er estiski áhugin í svartkjaftinum lítil, og estiska sendinevndin ynskti, at støðið í sáttmálanum fór niður í helvt.

Laksakvotan er uppgjørd í fiskum, og vektin á hvørjum fiski er sett til 5 kg. Føroyska kvotan varð sett niður í 5 tons, ið svarar til 1.000 stk.

Ein grein er um at partarnir vilja virka fyri samstarvi millum vinnuna hjá báðum londunum.

Niðanfyri er yvirlit, ið vísir estisku og føroysku kvoturnar í 1992, 1993 og 1994. Talið av fiskiloyvum er óbroytt.

Estiskar kvotur í førovskum sjógvi (tons).

	1992	1993	1994
Svartkjaftur	6.000	6.000	3.200

Føroyskar kvotur í estiskum sjógvi (tons).

	1992	1993	1994
Toskur	500	300	200
Laksur	20	25	1.000 stk.
Sild	200	800	400
Brislingur	0	800	400

1. viðgerð 28. desember 1993. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 4. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. desember 1993 og eftir 1. viðgerð 28. desember 1993 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og **ein samd nevnd** mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 21. mars 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

FL jnr. 1555-9/90.

60 Skipan millum Føroya og Estland um sínámillum fiskirætindi í 1994

Ár 1993, leygardagin 18. desember legði løgmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið hjáløgdu avtalu frá 15. november 1993 millum Føroyar og Estland um sínámillum fiskirættindi í 1994.

Viðmerkingar:

Fundarsemjan frá samráðingunum við Estland er hjáløgd.

TAC'ið fyri tosk í Eystursjónum í 1994 er økt 50% sammett við 1993, og er nú 60.000 tons. TAC'ið var í 1993 40.000 tons og í 1992 100.000 tons. Samlaða toskakvotan hjá Estlandi í 1994 er 1.070 tons.

Føroyska sendinevndin legði fram uppskot um at føroyska toskakvotan fór upp samsvarandi økingina í TAC-num, men Estland var ikki fört fyri at lata so stóran part av kvotuni. Vegna ringu búskaparligu støðuna í løtuni er estiski áhugin í svartkjaftinum lítil, og estiska sendinevndin ynskti, at støðið í sáttmálanum fór niður í helvt.

Laksakvotan er uppgjørd í fiskum, og vektin á hvørjum fiski er sett til 5 kg. Føroyska kvotan varð sett niður í 5 tons, ið svarar til 1.000 stk.

Ein grein er um at partarnir vilja virka fyri samstarvi millum vinnuna hjá báðum londunum.

Niðanfyri er yvirlit, ið vísir estisku og føroysku kvoturnar í 1992, 1993 og 1994. Talið av fiskiloyvum er óbroytt.

Estiskar kvotur í føroyskum sjógvi (tons).

	1992	1993	1994
Svartkjaftur	6.000	6.000	3.200

Føroyskar kvotur í estiskum sjógvi (tons).

	1992	1993	1994
Toskur	500	300	200
Laksur	20	25	1.000 stk.
Síld	200	800	400
Brislingur	0	800	400

1. viðgerð 28. desember 1993. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 4. mars 1994 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. desember 1993 og eftir 1. viðgerð 28. desember 1993 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og **ein samd nevnd** mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 21. mars 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

FL jnr. 1555-9/90.

61 Skipan millum Føroyar og Russland um sínámillum fiskirættindi í 1994

Ár 1993, leygardagin 18. desember legði løgmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið hjáløgdu avtalu frá 3. desember 1993 millum Føroyar og Russland um sínámillum fiskirættindi í 1994.

Viðmerkingar:

Váttaða frásøgnin frá 17. fundinum í føroysku-russisku felags-nevndini um sínámillum fiskivinnumál er hjáløgd. Hon er skrivað á enskum og er umsett til føroyskt. Samráðingarnar fóru fram í Tórshavn 30. november - 3. desember 1993.

Eins og í sáttmálunum fyri 1992 og 1993 er grein um at partarnir vilja arbeiða fyri víðkaðum samstarvi millum feløg og virki innan fiskivinnuna. Ein serlig nevnd skal setast í seinasta lagi í januar 1994 at fáa gongd á hetta. Víst verður til grein VIII í váttaðu frásøgnini.

Fyritreytirnar fyri samráðingunum:

Í norsk-russisku sínámillum fiskivinnunevndini ásetta londini hvussu stór heildarveiðin skal vera í Barentshavinum og hvussu nógv kann latast triðjalondum.

Fyri 1994 øktist TAC'ið á toski til 700.000 tons úr 500.000 tonsum í 1993. Triðjalandskvotan í 1994 hjá Noreg er 36.000 tons og hjá Russlandi 24.000 tons. (Fyrr fingu Føroyar alla triðjalandskvotuna hjá Russlandi, men í 1992 hevur Russland gjørt fiskiveiðisáttmála við Grønland, og verður ein partur latin teimum. Noreg letur EF ein stóran part, 20.500 tons, og restin verður latið Føroyum og Grønlandi.)

Gongdin í TAC-num fyri tosk í Barentshavinum hevur verið henda:

	TAC frá fiskifrøðingum	Heildarkvota ásett
1986	< 446.000	400.000
1987	< 645.000	560.000
1988	(530.000) 363.000	(578.000) 451.000
1989	300.000	360.000
1990	172.000	163.000
1991	215.000	215.000
1992	300.000	300.000
1993	500.000	500.000
1994	700.000	700.000

Heildarkvotan fyri hýsu í 1994 er ásett til 120.000 tons. Hon var í 1993 72.000 tons, í 1992 55.000 tons og í 1991 25.000 tons. Triðjalandskvotan í 1994 hjá Noreg er 4.800 tons og hjá Russlandi 3.200 tons.

Eingin lodnuveiða verður loyvd í 1994. Heildarveiðan fyri vetrarlodnu var í 1993 600.000 tons og í 1992 834.000 tons.

Úrslit av samráðingunum.

Í 1994 verður føroyska botnfiskakvotan býtt sundur í 18.600 tons av toski og 2.000 tons av hýsu, í alt 20.600 tons, íroknað hjáveiði. Hetta er í samsvar við økingina í TAC-num og Føroyar fáa sama part av russisku triðjalandskvotuni sum í 1993. Flatfiskakvotan verð sett 1.000 tons niður, í 2.500 tons. Beinleiðis veiða av svartkalva er ikki loyvd í 1994. Rækjukvotan verð sett 500 tons niður, í 2.500 tons. Tað bar ikki til hjá Russlandi at lata nakra toskakvotu í Eyrsjónum í 1994.

Russiska kvotan av svartkjafti er 140.000 tons. og er hetta sama kvota sum í 1993. Íroknað hesi kvotu er 15% hjáveiða av makreli og 5% hjáveiða av sild loyvd. 5 russisk skip kunnu reka royndarfiskiskap eftir atlanto-skandiskari sild uorðanfyri 63° N. Nøgdin má ikki fara upp um 2.000 tons.

Í 1994 verður talið av russiskum fiskiloyvum økt við 3 skipum alt árið. Eins og undanfarin ár er eingin avmarking fyri føroysk skip í Barentshavinum og í felagsøkinum í Barentshavinum.

Hjálagt er yvirlit yvir føroysku og russisku kvoturnar 1990-1994.

1. viðgerð 28. desember 1993. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 4. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. desember 1993 og eftir 1. viðgerð 28. desember 1993 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og **ein samd nevnd** mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 21. mars 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

FL jnr. 1555-2/90.

62 Eykafíggjarlóg 1993

Ár 1993, leygardagin 18. desember legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Sí skjal 4

Viðmerkingar til eykafíggjarlóg 1993

Fíggjarlógin fyri 1993, so sum løgtingið samtykti hana, hevði undir hvørjari útreiðslugrein eina konto kallað "færri lønarútreiðslur" við tí samlaðu upphæddini, sum skuldi sparast í lønum á greinini. Tí hevur landsstýrið sett ein teig afturat, har lønarútreiðslurnar eru býttar út á tey ymisku rakstrarstøðini.

Soleiðis sum búskaparliga støðan hevur verið í landinum seinastu árini, hevur verið sera torført at mett bæði um inntøkur og útreiðslur. Og hetta kemur eisini til sjóndar á eykafíggjarlógini fyri 1993.

Inntøkurnar eru minkaðar ár undan ári, og soleiðis hevur tað eisini verið í 1993.

Á fíggjarlógini fyri 1993 varð mett, at skattainntøkan fór at verða kr. 888.000.000,-, men nú sær út til at skattainntøkan verður kr. 74.000.000,- minni ella kr. 814.000.000,- í 1993.

Hetta er fyrsta árið við meirvirðisgjaldinum. Tørført var at meta um, hvussu nógv meirvirðisgjaldið fór at geva, bæði tí at tað var fyrstu ferð, ein slík meting skuldi gerast, og eisini tí at nýtslan og virksemið sum heild sýnist at vera støðugt minkandi.

Mett varð, at meirvirðisgjaldið fór at geva landskassanum kr. 563.000.000,-, men verður meirvirðisgjaldið helst kr. 85.000.000, minni ella kr. 478.000.000,- í 1993.

Roknað varð við, at endurgjald fyri vørur á goymslu, sum skuldi rindast í 1993, fór at verða kr. 28.000.000,-; men tað vísir seg nú, at útreiðslurnar verða kr. 26.000.000,- meira ella kr. 54.000.000,- í 1993.

Eisini aðrar inntøkur á fíggjarlógini 1993 verða minni enn roknað varð við, tá fíggjarlógin var samtykt. Tað er brennioljugjaldið, virðis- og vektargjaldið, ferðaavgjaldið, arvagjøldini og rentuinntøkurnar.

Samlaðu inntøkurnar í 1993 verða nú mettar til kr.
2.459.503.000,- ella kr. 241.102.000,- minni enn á fíggjarlógini.

Samlaðu útreiðslurnar í 1993 verða nú mettar til kr. 5.057.393.000,- ella kr. 2.386.179.000,- meir enn á fíggjarlógini.

Samandrátturin av broytingunum á fíggjarlógini 1993 er sostatt:

Minniinntøkur	kr. 241.102.000,-
Meirútreiðslur	kr. 2.386.179.000,-
Tilsamans at seta á eykafíggjarlógina	kr. 2.627.281.000,-

Hetta hevur sínar serligu orsøkir. Greinin serligar útreiðslur er uppá kr. 2.290.000.000,-. Herav eru kr. 2.210.000.000,- eginpeningur til Sjóvinnubankan og Føroya Banka, meðan eginkapitalur til Menningargrunnin og Ídnaðargrunnin er ávikavist kr. 65.000.000,- og kr. 15.000.000,-.

Eisini í 1993 eru effektivu veðhaldsútleggini størri enn játtanin. Á eykafíggjarlógini eru settar kr. 60.000.000,-, sum eru goldnar fyri eitt lán hjá IRF.

Meirútreiðslurnar eru:

Meirútreiðslur tilsamans í 1993	kr. 2.386.179.000,-
- Serligar útreiðslur	kr. 2.290.000.000,-
	kr. 96.179.000,-
- Veðhaldsútlegg IRF	kr. 60.000.000,-
Vanligar meirútreiðslur	kr. 36.179.000,-

Á vanliga rakstrinum hevur meirútreiðslan í 1993 sostatt verið kr. 36.179.000,-. Harav er eykajáttan fyri tilsamans kr. 11.355.000,- fingin til vega í árinum.

Viðmerkingar til tey einstøku rakstrarstøðini.

Rakstrarstað 8001 Heildarveiting og Rakstrarstað 8005 Afturgjald:
Skiftið frá afturgjaldi til heildarveiting frá 1. juli 1993 viðvíkjandi útreiðslum til almannaveitingar hevur við sær eina meirinntøku uppá kr. 122.525.000,- til heildarveiting, so henda í 1993 verður kr. 685.525.000,- og eina minniinntøku til afturgjald uppá kr. 125.677.000,-, so afturgjaldið í 1993 verður kr. 118.323.000,-.

Rakstrarstað 10106 Løgtingsbygningur:
Játtanin til løgtingsbygningin er í 1993 kr. 558.000,-; men frá løgtingsskrivstovuni verður roknað við, at nýtslan verður kr. 743.000,-. Tað er kr. 185.000,- meir enn játtað. Rakstrarstaðið fevnir um rakstur av løgtingshúsinum og Gamla Apoteki, ið rúmar floksrúmum, fundarhølum og løgtingsskrivstovuni. Virksemið er tingarbeiði og floksvirksemi.

Løgtingsskrivstovan greiðir í viðmerkingunum frá, at rakstrarkostnaðurin kann ikki sparast longur niður, um løgtingið og politiska floksvirksemið skal virka.

Størstu útreiðslurnar eru:

Reingerð	kr. 280.000,-
El - hiti	kr. 158.000,-
Telefon	kr. 62.000,-
Tilsamans	kr. 500.000,-

Rakstrarstað 11015: Løgmaður og landsstýri:
Játtanin í 1993 er uppá kr. 3.212.000,-, men roknað verður við, at kr. 3.885.000,- verða brúktar í 1993.

Orsøkin til meirnýtsluna uppá umleið kr. 673.000,- eru hesar:

Útreiðslurnar á kontoini eru lógarbundnar. Roknað varð í fíggjarlógaruppskotinum við 6 landsstýrismonnum fyri árið 1993. Nýggja lógin um løn til landsstýrismenn ger, at landsstýrismenn fáa løn í 6 mánaðir, tá teir fara frá, um teir hava verið landsstýrismenn í meira enn 1 ár. Løgmansskifti var í januar, og varð nýtt landsstýri skipað í apríl. Hetta førdi við sær eina eyka løgmansløn í 6 mánaðir og 3 eyka landsstýrismannalønir í 6 mánaðir. Hinvegin er nakað spart á vistarhaldskontoini, og hevur landsstýrisskiftið onga ávirkan havt á konto fyri bíðipening.

Rakstrarstað 11257 Toll- og Skattstova Føroya:
Líkningarráðið. Tollstovan og Tolleftirlitið eru í árinum løgd saman í eina stovn.

Játtanin til Toll- og Skattstovu Føroya var í 1993 tilsamans uppá kr. 47.553.000, men roknað

verður við, at brúktar verða kr. 48.939.000, tað vil siga kr. 1.385.770 meira enn játtað.

Umframt at stovnarnir eru lagdir saman í ein stovn, skal stovnurin umsita meirvirðisgjaldið.

Upphæddin kemur soleiðis fram:	
Meirnýtsla fyri 1993.	
Mett útfrá nýtsluni pr.31.10.1993.	kr. 961.000,-
Heraftrat koma:	
Leiguútreiðslur og innbúgv	
frá Tórshavnar Kommunu	kr. 125.000,-
Útreiðslur í sambandi við	
samanlegging í Vágunum.	kr. 300.000,-
Tilsamans	kr. 1.386.000,-

Orsøkin til, at hesin peningur vantar í nú, er tann, at Toll- og Skattstovan hevur goldið nógvar útreiðslur í 1993 í sambandi við samanleggingina av Líkningarráð Føroya og Føroya Tollstovu og útreiðslur við at gjøgnumføra meirvirðisgjald.
Útreiðslurnar eru hesar:

Ferða- og dagpeningur innan- og uttanlands	kr. 280.000,-
(Hetta er mest til útlendskar serfrøðingar)	
Skeið	kr. 20.000,-
Sakkøn hjálp	kr. 200.000,-
Húsaútreiðslur	kr. 600.000,-
(Hetta er í sambandi við samanleggingina)	
Tilsamans	kr. 1.100.000,-

Toll- og skattstovan hevði játtan til hesar útreiðslur í 1992, men av tí at nógvar avgerðir í sambandi við samanleggingina vórðu nógv seinkaðar, eitt nú avgerðin um at niðurleggja deildir á bygdunum, og at avgerðin, um at byrja við meirvirðisgjaldinum ikki varð tikin í góðari tíð, fullu omanfyrinevndu útreiðslur í 1993 ístaðin fyri 1992.

Toll- og Skattstovan - t.v.s. Líkningarráð Føroya og Føroya Tollstova - høvdu tilsamans eitt munandi avlop í 1992.

Rakstrarstað 11359 Almannastovan:
Játtanin til Almannastovuna er í 1993 kr. 14.543.000, meðan nýtslan í 1993 væntandi verður kr. 16.128.000.

Meirnýtslan í 1993 verður sostatt kr. 1.585.000, sum Almannastovan hevur fingið eykajáttan til í árinum. tíl EDV-ætlan kr. 1.000.000,- og til avloysara kr. 585.000,-.

Rakstrarstað 11409 Landsskúlafyrisitingin:
Játtanin til Landsskúlafyrisitingina er í 1993 kr. 8.572.000, men roknað verður við, at nýtslan verður kr. 8.870.000,-. Játtanin til Landsskúlafyrisitingina varð skerd úr kr. 10.600.000,- í 1992 í kr. 8.572.000,- í 1993. Fyri at fremja sparingina vórðu 20% av fólkunum søgd úr starvi. Landsskúlafyrisitingin greiðir frá, at hóasi roynt hevur verið at halda allar útreiðslur niðri á einum absoluttum minimum, fer fíggjarætlanin ikki at halda.

Rakstrarstað 11901 Landsverkfrøðingsskrivstova:
Hygg undir viðmerkingar til landsverkfrøðingsstovnin á § 13.

Rakstrarstað 11991/203507 Umboðan:
Játtanin til umboðan er í 1993 kr. 1.100.000,-, men øll játtanin verður ikki brúkt. Skotið verður tí upp at flyta kr. 250.000,- av konto umboðan til konto landsstýrinum at ráða yvir.

Rakstrarstað 11991/373305. Landsstýrinum at ráða yvir:
Játtanin til hesa konto er í 1993 kr. 1.300.000,-: men útreiðslurnar á konto landsstýrinum at ráða yvir gjørdust størri enn roknað var við. Nýtslan í 1993 verður væntandi kr. 1.550.000,-. Tað er kr. 250.000,-; tí verður skotið upp, sum nevnt undir rakstrarstað 11991/203507 umboðan, at flyta kr. 250.000,- frá konto umboðan til konto landsstýrinum at ráða yvir. Meirnýtslan kemst av, at samsýningarnar til limirnar í stýrisskipanarnevndini og teirri búskaparligu endurreisingarnevndini fara av hesi konto. Somuleiðis er Árni Olafsson læntur úr uttanríkismálaráðnum í eitt ár frá 1. juni 1993 at rokna, og verður løn hansara bókað á hesi konto. Umbókingin førir ikki samlað eykaútreiðslur við sær.

Rakstrarstað 12007 Sjúkrakassar:
Játtanin til sjúkrakassar er í 1993 kr. 15.000.000,-, meðan roknað verður við, at nýtsian í 1993 verður kr. 16.953.000,-. Meirnýtslan verður sostatt kr. 1.953.000,-.

Lógarbroyting er framd við gildi frá 15. juli 1993, og er partur av hesi afturbering landskassans til sjúkrakassarnar viðvíkjandi útreiðslum í 1992.

Rakstrarstað 12012 Hjálpitólamiðstøðin:
Hjálpitólamiðstøðin hevur kravt ómaksgjald frá Almannastovuni; men grannskoðanin hevur mett, at heimild ikki er fyri hesum. Hetta er tí hildið uppat í 1993.

Almannastovan hevur sostatt spart hesa útreiðslu í 1993, neyðugt verður at Hjálpitólamiðstøðin fær eykajáttan uppá kr. 300.000,-.

Rakstrarstað 12026 útreiðslur viðvíkjandi Ríkissjúkrahúsinum:
Játtanin á hesi konto er í 1993 uppá kr. 26.500.000,-, men roknað verður við, at brúktar verða kr. 31.000.000,-. Meirnýtslan verður sostatt kr. 4.500.000,- í 1993.

Rakstrarstað 12907/373305 Landsstýrinum at ráða yvir. Søkt er fíggjarnevndina um eykajáttan uppá kr. 1.300.000,- vegna dóm í rættarmáli um endurgjald uppá kr. 1.300.000,-. Tað er endurgjald til ein sjúkling.

§ 12. Íløgur. Landssjúkrahúsið:
Játtanin til umvælingar á landssjúkrahúsinum er í 1993 kr. 6.000.000,-; men roknað verður við, at brúktar verða kr. 7.057.000,- í 1993. Meirnýtslan uppá eina millión krónur er brúkt til umvæling av ketlum. Við tað, at henda umvæling er gjørd í 1993, verður játtanin til umvælingar á landssjúkrahúsinum í 1994 minkað samsvarandi.

Rakstrarstað 13265 Strandferðsla Landsins:
Strandferðsla Landsins er nú eitt rakstrarstað.

Játtanin er í 1993 kr. 5.000.000,- til tyrlutænastuna, kr. 23.000.000,- til Strandferðslu Landsins og kr. 15.000.000,- til Bygdalciðir ella tilsamans kr. 43.000.000,-; men roknað verður við at nýtslan verður kr. 50.360.000,-, tað er kr. 7.360.000,- meira enn játtanin.

Væntandi verða samlaðu inntøkurnar í 1993	kr. 75.035.000,-
og samlaðu útreiðslurnar	kr. 125.395.000,-
Undirskot 1993	kr. 50.360.000,-
Játtan 1993	kr. 43.000.000,-
Meirnýtsla 1993	kr. 7.360.000,-

Rakstrarstað 13089 Postverkið:
Postverkið hevur søkt um eina eykajáttan í 1993 uppá kr. 4.200.000,-.

Væntaðar inntøkur 1993	kr. 55.100.000,-
Væntaðar útreiðslur í 1993	kr. 66.300.000,-
Úrslit postur 1993	kr. -11.200.000,-
Úrslit frímerkjadeildin	kr. 8.500.000,-
Samlað úrslit 1993	kr. - 2.700.000,-
Avskrivingar	kr. 1.500.000,-
Rakstrarúrslit 1993	kr. - 4.200.000,-

§ 13. Landsverkfrøðingurin:
Til tey málsøki, sum landsverkfrøðingurin umsitur, eru játtaðar kr. 153.500.000,-.

Mett verður, at landsverkfrøðingurin samanlagt kann halda seg innanfyri hesa játtan í 1993, men tað verður flutt nakað millum tær ymsu kontir.

Á rakstrarstað 11901 Landsverkfrøðingsskrivstova verða brúktar kr. 614.000 meira enn játtað í 1993, og eisini á konto 13023 Havnagerð verða brúktar kr. 800.000,- meira enn játtað, meðan tað á konto 13037 lendingar og konto 13042 flogferðsla verða brúktar ávikavist kr. 400.000,- og kr. 1.000.000,- minni enn játtað í 1993.

Rakstrarstað 14103 Fólkaskúlin:
Í 1993 eru játtaðar fólkaskúlanum kr. 132.563.000,-. Men fólkaskúlin fer væntandi ikki at nýta alla játtanina í 1993. Roknað verður við, at kr. 2.000.000,- kunnu falla aftur í landskassan frá hesum rakstrarstaðnum.

Í eini semju, ið landsstýrið gjørdi við Lærarafelagið tann 16. februar 1993, stendur í grein 7: "Eitt møguligt avlop á fíggjarlógini innan fólkaskúlan í 1993 skal nýtast til undirvísing innan fólkaskúlan í 1993". Spurningurin er, hvussu hetta kann fremjast í verki, tí tað ber ikki til at økja undirvísingina í desember mánaði, tá tímaætlan og annað er lagt til rættis. Mælt verður til, at peningurin fellur aftur í landskassan.

Rakstrarstað 14122 Læraraeftirlønir:
Játtanin til læraraeftirlønir er í 1993 er kr. 11.000.000,-, men væntandi verða útreiðslur til eftirlønir til fólkaskúlalærarar kr. 100.000,- hægri í 1993 enn væntað. Av hesi upphædd verða 80% endurrindað frá ríkiskassanum sum endurgjald.

Rakstrarstað 14796 Sernámfrøðiliga ráðgevingin:
Skúlin á Trøðni søkir um eina eykajáttan uppá kr. 100.000,- til endurnýggjan av einum tóli, ið verður nýtt til calibrering av audiometrum, sum verða brúkt til at stilla hoyritól við. Talan er um eitt tól, ið bæði skal nýtast á skúlanum og til audiometrini hjá sjúkrahúsverkinum. Um tólið ikki verður keypt, er neyðugt at senda audiometur til Danmarkar at calibrera.

Rakstrarstað 14155 Student/HF, Suðuroyardeildin:
Játtanin í 1993 er uppá kr. 2.300.000,-, men roknað verður við, at brúktar verða kr. 2.934.000,- í 1993.

Meirútreiðslur hava staðist av at flyta HF-skeiðið av Tvøroyri til miðnámsskúlan í Vági. Harumframt hava lønarútreiðslurnar verið nakað størri enn væntað.

Av tí samlaðu meirnýtsluni uppá kr. 520.000,- er eykajáttan fingin í árinum fyri kr. 320.000,-.

Herumframt verður søkt um eykajáttan fyri leigu uppá kr. 114.000,-. Hetta er leiga til Tvøroyrar kommunu frá 1. januar til 1. juli 1993 kr. 79.000,- og kr. 35.000,- til Arbeiðsmannafelagið Framtíðin. Leigan frá 1. januar til 1. november 1993 var uppá kr. 71.000,- og av hesum eru kr. 36.000,- goldnar.

Rakstrarstað 14661 Fiskiídnaðarskúli í Norðstreymi:
Játtanin í 1993 er uppá kr. 1.300.000.-, men roknað verður við at brúktar verða kr. 2.370.000,-. Skúlin er ikki sum ætlað fluttur til Klaksvíkar.

Eykajáttan er fingin í árinum fyri meirnýtsluni uppá kr. 1.070.000,-.

Norðoyardepilin:
Rakstrarstað 14307 Tøkniútbúgving:
Játtanin í 1993 er uppá kr. 4.397.000,-, men roknað verður við, at brúktar verða kr. 7.781.000,-.

Meirnýtslan verður sostatt uppá kr. 3.384.000,-; av hesum er eykajáttan fingin til vega í árinum uppá 2.280.000,-.

Tær ítrestandi meirútreiðslurnar standast av:

Rakstrarhalli	kr. 907.122,59
Játtan til deildarleiðaran á HT	kr. 43.000,-
Útbúnaður til byrjan av nýggjum fakum	kr. 100.000,-
Mett løn til fyribilsstjóra	kr. 54.000,-
Tilsamans	kr.1.104.000,-

Rakstrarstað 14397 Fiskivinnuútbúgvingar:
Játtanin til fiskivinnuútbúgvingar í Norðoyardeplinum í 1993 er kr. 587.000,-. Men hesin peningur verður ikki nýttur í 1993.

Rakstrarstað 14409 Sjómansútbúgvingar:
Játtanin í 1993 er uppá kr. 1.835.000,-, men roknað verður við, at brúktar verða kr. 2.135.000,- í 1993.

Eykajáttan er fingin í árinum fyri meirnýtsluni uppá kr. 300.000,-.

Rakstrarstað 14169 Student/HF Norðoyardepilin:
Játtanin í 1993 er uppá kr. 2.021.000,-, men roknað verður við, at brúktar verða kr. 2.321.000,- í 1993.

Eykajáttan er fingin í árinum til meirnýtsluni uppá kr. 300.000.-

Rakstrarstað 14205 Studentaskúli í Hoydølum:
Játtanin í 1993 er uppá kr. 18.238.000.-, men roknað verður við at brúktar verða kr. 20.918.000.- í 1993.

Eykajáttan er fingin í árinum til meirnýtsluna uppá kr. 1.680.000,-, men neyðugt verður við eini eykajáttan uppá umleið kr. 1.000.000,- afturat. Orsøkin er, at lønarútreiðslurnar hava verið hægri enn mett, m.a. tí 2 lærarar hava havt langa sjúkralegu. Harafturat hevur skúlin ikki hildið boðini frá Landsskúlafyrisitingini um, at kantinan skal hvíla í sær sjálvari í 1993.

Rakstrarstað 14447 Handilsskúlin:
Játtanin til handilsskúlan í 1993 er kr. 12.897.000.-; men roknað verður við, at nýtslan í 1993 verður kr. 13.976.000,-. Tað er ein meirnýtsla uppá kr. 1.070.000.-.

Rakstrarstað 14447 Tøkniútbúgvingar:
Játtanin í 1993 er uppá kr. 10.416.000,-, men roknað verður við, at landskassans partur í 1993 verður kr. 12.748.000,-.

Væntaðar rakstrarútreiðslur tilsamans	kr. 14.378.000,-
Kommunustuðul	kr. 1.630.000,-
Rakstrarútr. landskassans partur	kr. 12.748.000,-
Játtan á fíggjarlógini 1993	kr. 10.416.000,-
Rakstrarhall 1993	kr. 2.332.000,-

Av samlaða rakstrarhallinum uppá kr. 2.332.000,- er eykajáttan uppá kr. 1.460.000,- fingin til vega í árinum. Søkt verður tí um eina eykajáttan uppá kr. 872.000.-.

Rakstrarstað 14453 Føroya Læraraskúli:
Játtanin til læraraskúlan í 1993 er kr. 8.907.000,-; men roknað verður við, at nýtslan í 1993 verður kr. 9.407.000,-. Tað er ein meirnýtsla uppá kr. 500.000,-. Orsøkin er, at Føroya Læraraskúli hevur fingið álagt somu lønarskerjing sum aðrir stovnar, men av tí at so nógvir danskir tænastumenn eru á stovninum, og hesir ikki eru farnir niður í løn, hevur ikki borið til at framt somu sparing her.

Rakstrarstað 14307 Føroya Sjómansskúli:
Játtanin í 1993 er uppá kr. 5.206.000,-, men roknað verður við at brúktar verða kr. 6.376.000,-. Eykajáttan er fingin í árinum til meirnýtsluna uppá kr. 1.170.000,-.

Rakstrarstað 14414 Føroya maskinskúli:
Játtanin í 1993 er uppá kr. 6.055.000,-, men roknað verður við at brúktar verða kr. 6.255.000,- í 1993. Eykajáttan er fingin í árinum til meirnýtsluna uppá kr. 200.000,-

Rakstrarstað 14485 Dieselmotorsimulator:
Játtanin til dieselmotorsimulatur er í 1993 kr. 490.000,-; men roknað verður við, at útreiðslurnar í 1993 verða kr. 548.000,-. Tað er kr. 58.000,- meir enn játtað. Hetta eru sáttmálabundnar útreiðslur.

Rakstrarstað 14744 Samarbeiði DGU/Føroya Jarðfrøðissavn:
Játtanin til hetta rakstrarstað er í 1993 kr. 809.000,-, men roknað verður við, at útreiðslurnar í 1993 verða kr. 34.000,- hægri, ella kr. 843.000,-.

Tá fíggjarlógin var niðurskorin orsakað av lønarlækkingini, var eisini skorið her, men tað ber ikki til at spara av teim donsku lønunum, ið verða goldnar av hesum rakstrarstað.

Rakstrarstað 14551 Húsarhaldsskúlar:
Játtanin til húsarhaldsskúlar er í 1993 kr. 1.043.000,-, men roknað verður við, at brúktar verða kr. 1.178.000,-.

Meirnýtslan uppá kr. 135.000,- stendst av, at skúlin hevur havt ein ódekkaðan peningatørv frá 1991, samstundis sum tað hevur verið ómøguligt at fingið hetta inn aftur gjøgnum sparingar.

Rakstrarstað 14618 Musikkskúlar:
Játtanin til musikkskúlar í 1993 er uppá kr. 3.702.000,-; men roknað verður við, at nýtslan verður kr. 200.000,- meira. Hetta kemst av, at í býtinum av lønarsparingini í 1993 hjá bólkinum "Onnur undirvísing" fekk Musikkskúlin ein lutfalsliga ov stóran part, umleið kr. 200.000,- og nógv.

Fyrr í ár fekk skúlin eina eykajáttan uppá kr. 200.000,-, og var hetta fyri at kunna varðveita 25 lærarar innan musikkskúlaskiparina. Í hesum sambandi vísti Landsskúlafyrisitingin landsstýrinum á, at neyðugt var at gera eitt umbýti av lønarsparingini fyri bólkin "Onnur undirvísing" - tað er Húsarhaldsskúlin í Klaksvík, Fólkaháskúlin og Frítíðarundirvísingin. Hetta umbýti er ikki gjørt, og hinir stovnarnir fara ikki at klára eina skerjing nú. Av hesi grund er neyðugt at veita Musikkskúlanum kr. 200.000,- í eykajáttan afturat.

Rakstrarstað 14471 Útgerð:
Játtanin til útgerð er í 1993 kr. 800.000,-, men roknað verður við, at tað bert verða brúktar kr. 400.000,- á hesi konto í 1993 ella kr. 400.000,- minni enn játtað.

Rakstrarstað 14879 Próvtøkur:
Játtanin til próvtøkur er í 1993 kr. 2.843.000.-, men játtanin til próvtøkur fer ikki at halda í 1993. Hetta kemst m.a. av, at ikki varð roknað við SIT próvtøkunum, tá fíggjarætlanin varð løgd. Roknað verður við, at brúktar verða kr. 3.043.000,- í 1993.

Rakstrarstað 14782 Burðarfarloyvi:
Játtanin til burðarfarloyvi er í 1993 kr. 563.000,-; men roknað verður við, at í 1993 verður nýtslan kr. 200.000,- minni enn játtanin, ella kr. 363.000,-.

Rakstrarstað 14796 Viðlíkahald:
Hetta rakstrarstaðið varð fyri fyrstu ferð upprættað í 1993, og játtanin fyri 1993 er kr. 200.000,-. Av tí at eingin reglugerð er gjørd fyri, hvussu peningurin skal verða nýttur, er einki brúkt av játtanini.

Mælt verður til, at játtanin fellur aftur í landskassan.

§ 14. Íløgur. Fólkaskúlin:
Játtanin til íløgur til fólkaskúlan í 1993 er uppá kr. 1.000.000.-; men roknað verður við, at bert kr. 300.000,- verða brúktar.

Rakstrarstað 14656 Landsmiðstøð fyri undirvísingarambod:
Játtanin til landsmiðstøðina fyri undirvísingarambod í 1993 er kr. 2.336.000.-; men roknað verður við, at nýtslan í 1993 verður kr. 2.871.000,-. Meirnýtslan uppá kr. 535.000,- er húsaleiga fyri 1993.

Rakstrarstað 15615 Sjónvarp Føroya:
Í 1992 varð játtað Sjónvarpi Føroya kr. 1.000.000,- til nýíløgur. Í árinum játtaði landsstýrið øðrum stovni kr. 600.000,- burtur av hesum peningi. Tí søkti sjónvarpið 21. desember 1992 um at keypa tól fyri kr.450.900,-; men av tí at tað var so seint á árinum, kundi útgerðin ikki keypast í 1992, so peningurin varð ongantíð brúktur.

22. september 1993 skrivar sjónvarpið aftur til landsstýrið og vísir á, at tey elstu rørcanueraini - sum eru 10 ár - nú eru so slitin, at tey mugu skiftast út, og tað fer at kosta kr. 550.080.-. Samstundis ger sjónvarpið í viðmerking vart við, at tað stutt sagt ikki letur seg gera at reka

eitt sjónvarp, uttan áhaldandi at gera íløgur í tekniska útgerð bæði tí, at útgerðin slítist nógv, og av tí at teknikkurin broytist støðugt.

Søkt verður um eykajáttan uppá kr. 1.000.000,- til omanfyrinevndu tól.

Rakstrarstað 15907/323124 Norðurlandahús:
Norðurlandahúsið hevur søkt Nordisk Ministerråd um kr. 750.000,- til eina neyðútgongd, sum Brunaumsjón Landsins hevur álagt teimum at gera. Umsóknin er gingin á møti soleiðis, at Norðurlandahúsið fær kr. 350.000,- í 1993 og kr. 400.000,- í 1994.

Norðurlandahúsið hevur somuleiðis søkt landsstýrið um pening til endamálið ialt kr. 100.000,- sum landskassans part.

Mælt verður til at játta kr. 100.000,- á cykaliggjariógini 1993.

Rakstrarstað 16372 Skipaskrá og -uppmáting:
Játtanin til skipaskrá- og uppmáting er í 1993 kr. 700.000,-; men roknað verður við, at nýtslan verður kr. 760.000,-, ella kr. 60.000,- meira enn játtað.

Rakstrarstað 16417 Studningur til fiskivinnuna:
Játtanin til fiskivinnuna er í 1993 kr. 73.000.000,-; men roknað verður við, at briktar verða kr. 1.500.000,- meira í 1993 enn játtað, t.e. kr. 74.500.000,-. Hetta eru fyri mesta partin lógar- og kunngerðarbundnar útreiðslur.

Rakstrarstað 16607 Fiskivinnuráð:
Játtanin til fiskivinnuráð er í 1993 kr. 250.000,-; men roknað verður við, at nýtslan verður kr. 330.000,-. Tað er kr. 80.000,- meira enn játtað. Henda konto hevur framhaldandi havt ov lítla játtan, tí skrivarin hjá Fiskivinnuráðnum, sum varð yvirtikin frá Ráliskagrunninum, verður liggjaður av hesi konto.

Rakstrarstað 16626 Magnus Heinason:
Játtanin til Magnus Heinason er í 1993 kr. 6.241.000,-; men roknað verður við, at nýtslan í 1993 verður kr. 7.041.000,-. Tað er kr. 800.000,- meir enn játtað.

Játtanin er minkað úr kr. 8.938.000,- í 1992 niður í kr. 6.700.000,- í 1993. Umframt hetta er játtanin minkað við kr. 459.000,- í sambandi við lønarsparingar.

Hóast fólk eru søgd úr starvi, og sparingar eru gjørdar í øllum útreiðslum, resta kr. 800.000,- í. Orsøkin er fyrst og fremst, at inntøkan av avreiðingum hevur verið minni enn væntað.

Umframt hetta fæst ikki endurgjald fyri meirvirðisgjald, og tískil eru kr. 300.000,- í eyka meirvirðisgjaldsútreiðslum.

Rakstrarstað 16904/333099 útróðrarstøðir:
Tað er ikki játtaður nakar peningur til útróðrarstøðir í 1993, men roknað verður við, at í 1993 verða brúktar kr. 115.000,- til at gera ymisk arbeiði liðug.

Rakstrarstað 16904/333129 Til upplýsing um grind:
Játtanin til upplýsing um grind er í 1993 kr. 260.000,-, men roknað verður við at nýtslan í 1993 verður kr. 410.000,-. Tað er kr. 150.000,- meir enn játtað. Kr. 150.000,- eru fluttar frá rakstrarstað 16904/333208: limagjald í fleirtjóðafelagsskapum.

Vegna økta luttøku í NAMMCO-fundum, sum partvís er tíggjað av hesi konto, framleiðslu av einum upplýsandi filmi um grind og økt arbeiði við at mótvirka áganginum móti grindadrápi í Bretlandi, er kostnaðurin farin upp um ásettu upphæddina.

Rakstrarstað 16904/333208 Limagjald í fleirtjóðafelagsskapum:
Játtanin til limagjald í fleirtjóðafelagsskapum er í 1993 kr. 860.000.-; men roknað verður við, at nýtslan í 1993 verður ikki so stór. Tí verða kr. 150.000,- fluttar til rakstrarstað 16904/333129 upplýsing um grind.

Rakstrarstað 16904/333408 Tiltøk fyri alivinnuna:
20. september 1993 samtykti landsstýrið at søkja tíggjarnevndina um eina eykajáttan uppá kr. 9.000.000.- til tiltøk til alivinnuna fyri 1993. Ætlan landsstýrisins er at seta nevndu kr. 9.000.000,- á eykafíggjarlógina fyri 1993.

Í skrivi til landsstýrið dagfest 20. oktober 1993 sigur tíggjarnevnd løgtingsins, at tíggjarnevndin hevði viðgjørt málið og ein samd nevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins, ið sostatt er samtykt.

Rakstrarstað 16904/333958 Landsstýrinum at ráða yvir:
Játtanin til hetta rakstrarstað var í 1993 kr. 200.000.-, men roknað verður við, at brúktar verða kr. 100.000,- meira.

§ 16 Íløgur. Vaktarskip:
Á fíggjarlógini 1993 eru játtaðar kr. 1.000.000,- til endamálið, men roknað verður ikki við, at peningurin í 1993 verður brúktur.

Rakstrarstað 18109 Arbeiðseftirlit:
Játtanin til Arbeiðseftirlitið er í 1993 kr. 2.719.000,-, men roknað verður við, at nýtslan í 1993 verður kr. 3.000.000,-. Tað er kr. 281.000,- meir enn játtanin.

Orsøkin er, at játtanin var skorðin niður úr kr. 3.633.000,- í 1992 í kr. 2.719.000,- í 1993, tí ætlanin var at taka gjald fyri ymiskar tænastur hjá stovninum. Men reglurnar komu so seint í gildi, at tær ikki fingu ávirkan á alt árið.

Rakstrarstað 18216 Radioeftirlit:
Játtanin til radioeftirlit er í 1993 kr. 258.000,-; men roknað verður við, at nýtslan í 1993 verður 296.000,-, t. e. kr. 38.000,- meir enn játtanin.

Rakstrarstað 18323 Studningur til kolagrevstur:
Játtanin til studning til kolagrevstur er í 1993 kr. 400.000,-.
Men í árinum er fingin til vega eykajáttan uppá kr. 190.000,-, samstundis sum rakstrarstað 18532: Studningur til íðnaðarfremjandi endamál verður lækkað samsvarandi.

Sostatt verða kr. 590.000,- at nýta til studning til kolagrevstur í 1993.

Rakstrarstað (nýtt rakstrarstað) Fyrireiking av føroyskum skrásetingarmyndugleika:
Mett verður at kr. 100.000,- verða brúktar í 1993 til fyrireiking av partafelagsskrásetingini, sum fylgja av nýggju lógini um partafeløg.

Rakstrarstað 18584 Vørumenning og innlutningur av fiski:
Játtanin til hetta endamál í 1993 er kr. 23.000.000,-. Men bert kr. 6.000.000,- eru nýttar. Allar umsóknir um stuðul, sum hava uppfylt treytirnar eru gingnar á møti. Áhugin hjá vinnuni hevur ikki verið til meira enn kr. 6.000.000,-.

Rakstrarstað 19056 Fólkapensión:
Játtanin til fólkapensión er í 1993 kr. 226.700.000,-, men roknað verður við, at nýtslan í 1993 verður kr. 236.600.000,-. Tað vil siga ein meirnýtsla uppá kr. 9.900.000,-.

Orsøkin er, at lítil og eingin sparing er við lógarbroytingini um at inntøkujavna tey millum 67 og 70 ár.

Rakstrarstað 19075 Røktarheim:
Játtanin til røktarheim er í 1993 kr. 68.000.000,-, men væntandi verða útreiðslurnar til endamálið í 1993 kr. 68.900.000,-.

Meirnýtslan uppá kr. 900.000,- stendst av broytingini í býtislóginí.

Rakstrarstað 19106 Avlamispensjón:
Játtanin til avlamispensjón er í 1993 kr. 107.800.000,-, men væntandi verða brúktar kr. 1.100.000,- minni enn játtað.

Orsøkin er, at upprættan av búfelagsskapi er seinkað.

Rakstrarstað 19208 Einkjubarnastyrkur:
Játtanin til einkjubarnastyrk er í 1993 uppá kr. 3.505,-; men væntandi verður nýtslan í 1993 kr. 4.700.000,- ella ein meir nýtsla uppá kr. 1.100.000,-.

Játtanin fevnir eisini um forskotsrindan av einkjubarnastyrki, og er sostatt talan um nettoútreiðslur.

Tað vísir seg at vera torført at fáa peningin, sum er lagdur út innaftur. Tí verður ein meirnýtsla.

Rakstrarstað 19301 Einkjupensjón:
Játtanin til einkjupensjón er í 1993 kr. 920.000,-, men roknað verður við, at nýtslan í 1993 verður kr. 100.000,- meira enn játtað. Hetta eru lógarbundnar útreiðslur.

Rakstrarstað 19403 Vanlig forsorg:
Játtanin til vanliga forsorg er í 1993 kr. 66.000.000,-. Men nett verður nú, at nýtslan verður kr. 57.000.000,- í 1993. Tað er kr. 9.000.000,- minni enn roknað var við.

Roknað hevur verið við, at útreiðslurnar til vanliga forsorg fóru at vaksa orsakað av broytingum í arbeiðsloysisskipanini, men metingin við royndum til oktober 1993 er, at nýtslan í 1993 fer at verða kr. 57.000.000,-.

Rakstrarstað 19441 Ymiskir forsorgarstovnar:
Játtanin til ymiskar forsorgarstovnar er í 1993 kr. 9.700.000,-. Men roknað verður við, at nýtslan í 1993 verður kr. 9.800.000,- ella kr. 100.000,- meir enn játtað.

Rakstrarstað 19547 Barnaforsorg:
Játtanin til barnaforsorgina er í 1993 kr. 13.700.000,-, men roknað verður við, at nýtslan í 1993 verður kr. 15.000.000,-.
Tað er ein meirjáttan, sum stendst av hækkandi útreiðslustøði til barnaverndaratgerðir.

Rakstrarstað 19631 Dagstovnar:
Játtanin til dagstovnar í 1993 er kr. 48.016.000,-; men roknað verður við at nýtslan í 1993 verður kr. 3.816.000,- minni enn játtanin, ella kr. 44.200.000,-. Hetta kemst m. a. av minni nýtslu av dagrøktarskipanini.

Rakstrarstað 19659 Dagpeningaskipanin:
Játtanin til dagpeningaskipanina er í 1993 kr. 42.800.000,-; men roknað verður við, at nýtslan verður kr. 6.300.000,- minni enn játtanin, ella kr. 36.500.000,-.

Rakstrarstað 19697 Samsýning at ansa eldri og óhjálpnum heima:
Játtanin í 1993 er kr. 7.300.000,-, men roknað verður við, at nýtslan í 1993 verður kr. 2.100.000,- minni, ella kr. 5.200.000,-

Rakstrarstað 19873 Inntøkutrygd hjá fiskimonnum:
Játtanin til inntøkutrygd hjá fiskimonnum er í 1993 kr. 76.800.000,-, men roknað verður við, at nýtslan í 1993 verður kr. 20.800.000,- meira, ella kr. 97.600.000,-.

Longu tíðliga í summar varð umsitingin varug við, at játtanin uppá kr. 76.800.000,- til inntøkutrygd fyri fíggjarárið 1993 ikki fór at halda við núverandi lógarásettum reglum. Orsøkin er vánaligur fiskiskapur og vánaligir prísir.

30. november 1993 hevði Lønjavningargrunnurin goldið kr. 81.900.000,-, umframt at umleið kr. 4.000.000,- lógu klárar at gjalda út.

Roknast má við, at útgjaldingarnar fyri rakstrarstaðið verða umleið kr. 97.600.000,- í 1993 býttar soleiðis:

Inntøkutrygd	kr. 93.100.000,-
Gjald til Arbeiðsloysistryggingina	kr. 1.700.000,-
Telefonendurgjald	kr. 2.800.000,-
Tilsamans	kr. 97.600.000,-

Lógaruppskot um telefonendurgjald er lagt fyri løgtingið.

Rakstrarstað 21 Effektivar veðhaldsbiudingar:
Játtanin til effektivar veðhaldsbindingar er í 1993 kr. 150.000.000,-. Higartil í ár eru goldnar umleið kr. 100.000.000,-
til veðhald fyri lánum til privat skip, virkir o.s.fr. Tað stendur nógv til at fara í løtuni, ella er farið, men veðhaldsbindingarnar eru enn ikki vorðnar effektivar, so tað verður helst brúk fyri teimum kr. 50.000.000,- kortini.

Eisini skal viðmerkjast, at saneringin av fiskavirkjunum er enn ikki endaliga avgreidd.

Herumframt hevur landskassin goldið kr. 60.000.000,- fyri eitt lán hjá IRF.

§ 28 Serligar útreiðslur:
Menningargrunnurin: Menningargrunnurin hevði við ársenda 1992 eginpening uppá -49 mió. kr. Við kapitalveitingini kom eginpeningurin uppá kr. 16.000.000,-.

Ídnaðargrunnurin: Ídnaðargrunnurin hevði við ársenda 1992 eginpening uppá -23 mió. kr. Við at sleppa einum landskassaláni uppá kr. 15.000.000,- og við kapitalveiting uppá kr. 15.000.000,-kom eginpeningurin uppá kr. 7.000.000,-.

Kapitalveitingar til bankar: Sjóvinnubankin fekk kapitalveiting uppá kr. 350.000.000,- sambært avtalu við donsku stjórnina 1. februar 1993. Føroya Banki og Sjóvinnubankin fingu kapitalveiting uppá kr. 560.000.000,- sambært avtalu við donsku stjórnina 28. mai. Føroya Banki og Sjóvinnubankin fingu veittar kr. 1.300.000.000,- sambært avtalu við donsku stjórnina 12. oktobur.

1. viðgerð 18. januar 1994. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 17. februar 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. desember 1993 og eftir 1. viðgerð 18. januar 1993 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini vent sær skrivliga til fíggjar- og búskapardeildina í Tinganesi við áheitan um at fáa eina útgreining, sum sýnir, hvussu stórur partur av meirútreiðslunum eru lógarbundnar útreiðslur, hvussu stórur partur eykajáttan er givin fyri, og hvat síðan eftir er av meirnýtslu, ið eykajáttan ikki er fingin til vega fyri.

Undir viðgerðini hevur fíggjarnevndin bildið fund við Finnboga Ísakson, landsstýrismann í fíggjarmálum, og Kára Petersen, deildarstjóra á fíggjardeildini, og Jóngerð Purkhús, fulltrúa, á fundinum fekk nevndin tær umbidnu útgreiningarnar, sum fevna um lógarbundnar útreiðslur, sattmálabundnar útreiðslur og útreiðslur, sum eykajáttan er givin til.

Hendan útgreiningin er sbrt. skjali frá landsstýrinum:

11015	Løgmaður og landsstýri	673.000	L
12007	Sjúkrakassar	1.953.000	L
12026	Útr. viðv. Ríkishospitalinum	4.500.000	L
14122	Læraralønir	100.000	L
14453	Føroya Læraraskúli	500.000	L
	Studningur til fiskivinnuna	1.500.000	L
333099	Útróðrarstøðir	115.000	L
16904/18109	Arbeiðseftirlitið	281.000	L
19056	Fólkapensjón	9.900.000	L
19075	Røktarheim	900.000	L
19208	Einkjubarnastyrkur	1.100.000	L
19301	Einkjupensjón	100.000	L
19444	Ymiskir forsorgarstovnar	100.000	L
14547	Barnaforsorg	1.300.000	L
19873	Inntøkutrygd hjá fiskimonnum	18.800.000	L
		41.822.000	

14155	Student/HF Suðuroyardepilin	634.000	S E	320.000
14661	Fiskiídnaðarskúli í Norðstr.	1.070.000	S E	1.070.000
14307	Tøkniútbúgvingar í Klaksvík	3.384.000	S E	2.280.000
14409	Sjómansútbúgvingar	300.000	S E	300.000
14169	Student/HF Norðoyadepilin	300.000	S E	300.000
14205	Studentaskúlin í Hoydølum	2.680.000	S E	1.680.000
14447	Handilsskúlin	1.070.000	S	
14447	Tøkniútbúgvingar	2.332.000	S E	1.460.000
14307	Føroya Sjómansskúli	1.170.000	S E	1.170.000
14485	Dieselmotorsimulator	58.000	S	
14744	DGU/Føroya Jarðfrøðisavn	34.000	S	
14618	Musikkskúlar	400.000	S E	200.000
14879	Prøvtøkur	200.000	S	
14656	Landsmiðstøð fyri undirvísing	535.000	S	
18216	Radioeftirlit	38.000	S	
		14.205.000	S	8.780.000

L= Lógarbundnar útreiðslur
S= Sáttmálabundnar útreiðslur
E= Eykajáttan fingin í árinum.

í tilknýti til omanfyri standandi hevði landsstýrið útvegað fylgjandi talyvirlit:

Brutto meirnýtsla	2.437.132.000	
- Serligar útreiðslur	2.290.000.000	L § 28
- Veðhaldsútlegg	60.000.000	L
	87.132.000	
- Aðrar lógarbundnar útreiðslur	50.822.000	L
- Sáttmálabundnar útreiðslur	14.205.000	
	22.105.000	

10106 Løgtingsbygningurin	185.000
11257 Toll- og Skattstova Føroya	1.386.000
11409 Landsskúlafyrisitingin	300.000
12907/373305 Landsstýrinum at raða yvir	1.300.000
Íløgur § 12 Landssjúkrahúsið, umvæling	1.000.000
13265 Strandfaraskip Landsins	7.360.000
13089 Postverkið	4.200.000
14796 Sernámfrøðilig ráðgeving	100.000
14554 Húsarhaldsskúlar	135.000
15615 Sjónvarp Føroya	1.000.000
15907/323124 Norðurlandahús	100.000
17372 Skipaskrá og uppmáting	60.000
16607 Fiskivinnuráð	80.000
16607 Magnus Heinason	800.000
16904/373305 Landsstýrinum at ráða yvir	100.000
Fyrireiking av vinnuskrá	100.000
	18.206.000

Landsstýrið hevur í viðmerkingum sínum til fyriliggjandi uppskot greitt frá tølunum á hesum rakstrarstøðum.

Í álitinum til eykafíggjarlógina 1992 gjørdi fíggjarnevndin vart við, at tað er beinari, at landsstýrið í lógaruppskoti sínum í staðin fyri eitt tal setir upp tað, ið játtað er eyka, og tað, sum er ójáttað.

Landsstýrið hevur í viðmerkingum sínum eins og í árunum áður tilskilað, um eykajáttan er fingin frá fíggjarnevndini.

Fíggjarnevndin heldur, at landsstýrið eisini í lógaruppskoti sínum eigur at útgreina, hvat eru lógarbundnar útreiðslur, og hvat ikki er lógarbundið, soleiðis at tað greitt framgongur, um talan er um óheimilaða meirnýtslu. Yvirhøvur er í fleiri førum talan um lógarbundnar útreiðslur, ið ikki slepst undan, men so má verða strembað ímóti at útreiðsluuppskotið til

fíggjarlógina, ið landsstýrið leggur fram 31. august, er heilt dagført. Hetta gevur eina beinari mynd av kostnaðinum av landsins umsiting. Ein neyðug fylgja av hesum má vera ein skjótari dagføring og møgulig eykajáttan soleiðis, at ikki ov stórar upphæddir koma óvæntaðar. Hetta eigur landsstýrið at syrgja fyri mótvegis løgtinginum.

Tískil er fíggjarnevndin av teirri fatan, at eykafíggjarlógin bert skal fevna um lógarbundnar meirútreiðslur og um eykajáttanir frá fíggjarnevndini. Endamálið við hesi málseting er, at landsstýrið skal áleggja stovnum sínum at fráboða gongdina á útreiðslupostunum hvønn manað, soleiðis, at ein óvæntað meirútreiðsla verður viðgjørd alt fyri eitt.

Í uppskotinum til eykafíggjarlóg eru fleiri beinleiðis umsóknir frá landsstýrinum um eykajáttan. Fíggjarnevndin ynskir hesa mannagongd broytta. Í øllum árinum er tíð til at fáa viðgjørt umsóknir um eykajáttan, og tí má meginreglan verða, at søkt verður beinanvegin, tað er greitt, at tørvur verður á eykajáttan og ikki, sum fleiri dømi eru um, tá árið skal gerast upp á gjaldstovuni.

Fíggjarnevndin viðurkennir, at teir allar flestu stovnar halda seg til játtanirnar. Hinvegin framgongur klárt, at nakrir ikki gera tað, og so verður tað upp til stovnarnar og landsstýrið í framtíðini at basa hesar trupulleikar og møguliga fáa ta eykajáttan, ið skal til. Eydnast hetta, so er allur formalitetur hildin sum tilætlaður.

Landsstýrið hevur í skrivi dagf. 24. januar 1994 boðað fíggjarnevndini frá fylgjandi:

"Í uppskoti til eykafíggjarlóg 1993, sum er lagt fyri tingið, er villa komin í.

Tann fyrsta er ein skrivivilla á rakstrarstað 14447 Tøkniútbúgvingar.

Har skal standa í teiginum eykafíggjarlóg 1993 kr. 2.332.000,- í staðin fyri kr. 872.000,-; sostatt kemur at standa kr. 12.748.000,- í staðin fyri 11.288.000,- í teiginum fyri samlaða játtan 1993.

Viðmerkingin til rakstrarstað nr. 14447 Tøkniútbúgvingar er í lagi.

Á rakstrarstað 14414 Føroya Maskinskúli skal í teiginum játtan 1993 standa kr. 6.255.000,-, og í teiginum eykajáttan 1993 kr. 0 í staðin fyri kr. 200.000,-. Samstundis fellur viðmerkingin til rakstrarstaðið burtur."

Føroya Handilsskúli

Í skrivi frá 19. november 1993 hevur landsstýrið søkt fíggjarnevndina um játtan kr. 1,1 mió. til eykafíggjartørv 1993 hjá Føroya Handilsskúla, Tórshavn. Landsskúlafyrisitingin hevur víst á fylgjandi tøkar fíggingarmøguleikar:

14312	Norðoyadepilin	587.000
14758	Útgerð	400.000
14782	Burðarfarloyvi	200.000
	Alt	1.187.000

Fíggjarnevndin hevur játtað nevndu kr. 1,1 mió., ið verða at taka av júst nevndu konti.

Fíggjarnevndin fer sostatt at seta fram broytingaruppskot í eykafíggjarlógini fyri 1993 samsvarandi omanfyrinevndu skrivum til fíggjarnevndina.

Umframt hesar broytingar verður neyðugt at minka rakstrarstað 19873 Inntøkutrygd hjá fiskimonnum við kr. 2.800.000, ið landsstýrið hevur skotið upp at veita eykajáttan til í 1993, men sum fíggjarnevndin ikki tekur undir við og mælir til í viðkomandi løgtingsmáli, at játtanin upp á kr. 2.800.000 í 1993 - telefonendurgjald til langfarafiskimenn - verður flutt á somu konto í fíggjarlógini í 1994.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Vísandi til frammanfyri standandi viðmerkingar mælir **meirilutin** (Vilhelm Johannesen, Jóhannes Ellefsen, Hergeir Nielsen, Karl Heri Joensen og Birgir Danielsen) til at samtykkja uppskot landsstýrisins við niðanfyristandandi broytingaruppskoti.

Meirilutin setir sostatt fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

14485	Handilsskúlar verður økt við	Handelsskoler forøges med	kr.	1.100.000.

til Føroya Handilsskúla

14447	Tøkniútbúgvingar í staðin fyri kr. 872.000 verður sett	Tekniske uddannelser i stedet for indsættes	kr.	2.332.000
14307	Tøkniútbúgving verður lækkað	Teknisk uddannelse reduceres	kr.	500.000

14771 Útgerð	Udstyr			
verður lækkað	reduceres	kr.	400.000	
14879 Burðarfarloyvi	Barselsorlov	kr.	200.000	
Greinin er sett til				kr. 351.901.000

§ 19 Inntøkutrygd hjá fiskimonnum	Fiskernes indtægts-garanti			
verður lækkað við	reduceres med	kr.	2.800.000	
Greinin er sett til				kr. 816.475.000

Ein minniluti (Birgir Danielsen) tekur undir við meirilutanum, men ger tó hesar viðmerkingar:

1) Postverkið varð á fíggjarlógini sett til at javnviga, men tá heuda varð kunngjørd, gjørdi postverksleiðslan vart við, at hetta undir táverandi umstøðum ikki for at bera til, men at raksturin í 1993 for at geva eitt hall upp 7 mió. Hetta varð tikið til eftirtektar og bygt inn í ta fíggjarætlan, sum var nýtt undir samráðingunum í Keypmannahavn 28. mai. Úrslitið er nú vorðið 4,2 mió. í halli.
Neyðug eykajáttan átti at verið fingin upp á pláss fyri einum ári síðani.

2) Alivinnan.
Lógina um íløgustuðul hava vit vitað um at kalla alt árið 1993. Uppskotið varð framlagt 24. mars og staðfest 2. apríl 1993. Tað hevur alla tíðina verið greitt, at 9 mió. restaðu í. Neyðug játtan átti at verið fingin til vega samstundis sum lógin varð framiøgd.

3) Strandferðslan.
Tá fíggjarlógin varð endurskoðað seinast í mai í samband við samráðingarnar, sum vóru í Keypmannahavn, var greitt, at strandferðslan fór at geva eitt stórt hall (7 mió.).

Fyri einum ári síðani var uppskot lagt fram á ting um privatisering av Smyrli og av lastbilunum (tvey privat partafeløg skuldu yvirtaka hesar aktivitetir, men umsitingin skuldi framvegis vera hjá strandferðsluni).

Hetta fekk ikki undirtøku. Orsøkin var, at tað valdaði ein stórur ótryggleiki viðvíkjandi rakstrarúrslitinum. Ongar kostnaðarætlanir vóru lagdar fram - heldur ikki eftir at málið hevði fingið viðgerð í samferðslunevndini. Eftir tað orðaskifti vóru góðar grundir til at kanna raksturin av Smyrli og av lastbilunum - og tað er kanska eisini vorðið gjørt - men eykajáttan hevur ikki verið havd á lofti í fíggjarnevnd fyrr enn nú, sjálvt um nógv týðir

uppá, at landsstýrið hevur vitað um tørvin, sí omanfyri.

Nú Smyril hevur verið í uttanlandssigling í næstan 2 ár, er tað vónandi møguligt hjá landsstýrismanninum í samferðslumálum at geva tinginum upplýsingar um, hvussu raksturin hevur borið seg hesa tíðina. Eisini hevði verið áhugavert at vita, um ætlanir framvegis eru um privatisering av skotlandssiglingini. Um ikki, hvat eru so orsøkirnar fyri hesum?

4) Fíggjarlógin generelt og tørvurin á øktum aktiviteti. Higartil hevur landsstýrið bert kunnað víst á tað neyðuga í at hækka inntøkurnar á fíggjarlógini fyri at betra javnvágina sambært kravboðum frá donsku stjórnini ("budgetforbedringer" upp á 250 mió. kr.). Úrslitið er, at skatta- og avgjaldsbyrðarnar eru vorðnar so stórar, at fólk við vanligum inntøkum ikki knógva undir okinum meira. Úrslitið er væl kent og átti at verið vælkent av kravboðstillaranum, áðrenn krøvini vórðu sett.

Vit sakna framtøk, sum kundu økt um aktivitetin í landinum. T.d. er bert lítil partur av tí, sum varð avsett á fíggjarlógini til vørumenning nýttur (6 mió. av 23 mió.) og hetta hóast ágangurin frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum hevur verið sera stórur, eins og tilboðini frá somu pørtum ikki hava trotið.

Í hesum sambandi eigur eisini at verða víst á uppskot fólkafloksins um lækking av lønunum og samsvarandi skattalækkan, sum fekk drúgva umrøðu í fíggjarlógarálitinum seinast og tí ikki skal umrøðast nærri her.

Eisini hevur fólkaflokkurin víst á tað bráðneyðuga í at fáa betrað um handilsviðurskiftini við ES. Einasta svar, vit hava fingið frá landsstýrinum er, at danir hava lovað at hjálpt okkum. Hetta vita vit. Men fyri at koma víðari er neyðugt, at vit sjálv vísa initiativ og vilja til at gera nakað við hetta stórmál. Hvørki er komið til sjóndar higartil!!! Ein kvalandi óvilji til at gera tað neyðuga ræður!! Tað sær ikki út til, at politisku flokkarnir hava fingið eyguni upp fyri teimum broytingum, sum eru farnar fram rundan um okkum eftir krígslok. Tað neyðuga dírvið til at umrøða hetta hevur tørvað. Tí eru vit kappingarføri viðvíkjandi afturútsiglðir. Her skal minnilutin vísa á fólkafloksins uppskot frá 8. februar 1994 um samráðingar um tollsamgongu við ES.

Tollfrælsi til ES fyri triðjalandsfisk og eitt ískoyti upp á 23 mió. kr. gevur fleiri 100 nýggj arbeiðspláss, meðan lítið og einki kann gerast við teimum 23 mió. uttan at loysa tolltrupulleikan.

At landsstýrið ikki vísir tað neyðugu afturhald í at økja um umsitingina, eru hesi dømi tekin um:

fiskivinnueftirlitsstovnurin
skrásetingarstovnurin
forstjórastarvið.

Minnilutin heldur, at tey stóru lógaruppskotini, sum eru til viðgerðar í løtuni - stýrisskipanarlógin og fiskiveiðulógin áttu at verið fingin upp á pláss, áðrenn bygnaðar viðkanir verða framdar í landsstýrinum.

Ein annar minniluti (Flemming Mikkelsen) førir fram:

Øllum kunnugt hevði løgtingsfíggjarlógin fyri 1993 ikki minni enn tvær framløgur.

Seinna framløgan, hin realistiska var eftir boðum frá ríkisstjórnini, ið ikki kundi góðtaka eitt væntað hall í 100 mió. klassanum.

Fyri at fáa kabaluna at ganga upp, vísti fólkaflokkurin, sum sat við fíggjarmálum sítt sanna andlit, og fór til verka. Sum ikki einaferð, beint øvugt av tí, hesin flokkur sigur sog vera borgan fyri. Ein sonn flóðalda av ymiskum inntøkulógum lloymdi omanyvir tann framman-undan hartskattaða og avgjaldstyngda samfelagsborgarin, sum enn ikki hevði slept vónini um at vera verandi í landinum.

Henda jagstran fólka- og javnaðarfloksins helt fram eftir landsstýrisskiftið. Tjóðveldis- og sjálvstýrisflokkurin tóku við har, hinir sleptu, og fyribils er steðgað við byrjanarstøðið til ognarskatt.

Niðurstøðan er vorðin tann, at umframt heimsmet í skuld pr. íbúgva, hava vit tann ivasama heiður at hava sett okkum nýtt heimsmet í skatta- og avgjaldsjagstran til ein botnleysan landskassa.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Finnbogi Ísakson, segði seg vera vælnøgdan við, at vanliga hallið sambært eykafíggjarlógini bert var 36 mió. kr.

Kann vera, men eykafíggjarlógin vísir, at hóast náðileysa skatta- og avgjaldstrýstið, so røkkur ikki saman kortini.

Ætlaða avlopið á fíggjarlógini og fyribils metta vanliga hallið vísir, at her hava resta út við 70 mió. kr. í.

Ein glotti er tó, at flestu almennir stovnar, tá teir eru frítiknir fyri politiska ávirkan, klára at halda seg innanfyri givna játtan.

Hóast okursbyrðar vóru lagdar á bæði konu og kall komu 40 mió. kr. (5%) minni inn í skatti enn ætlað, 153 mió. kr. (18%) minni inn í tolli, mvg v.m., 9 mió. (70%) minni í arva- og øðrum gjøldum, og rúsdrekkasølan gav 3,5 mió. (31%) minni enn ætlað.

Burtursæð frá eini óvanligari rentuinntøku, var tað bert blokkurin, so leingi tað varar, sum

gav nakrar mió. kr. meir enn ætlað. Heildarveitingin var í 1993 slakar 814 mió. kr. tilsamans.

Tær óvanligu ella sonevndu serligu meirútreiðslurnar á cykafíggjarlógini upp á tilsamans 2,3 mió. kr. fáa ikki ta stóru umtaluna.

Í stuttum verða orsøkirnar til hesar ógvusligu lántøkur kortini nevndar, men eitt liggur fast, hesar upphæddir eru skuldskrivaðar landskassanum.

Sum kunnugt fekk minnilutin ikki høvi til at luttaka í samráðingunum við ríkisstjórmina, og kann sostatt ikki ábyrgjast fyri tær í ávísum føri sera ivasomu niðurstøður, landsstýrið kom til.

Hvussu lántøkur landskassans mótvegis ríkiskassanum koma at mynda komandi fíggjarlógir, er sambært løgmann enn ógreitt.

Men givið er, at framhaldandi lántøkur og framhaldandi at økja eitt frammanundan alt ov høgt skatta- og avgjaldstrýst, fyri at fáa fíggjarlógina at hanga saman, kann ikki vera tikið undir við.

Ilin triði minnilutin (Tordur J. Niclasen) hevur annars hesar minnilutaviðmerkingar:

Bæði lógin um stýrisskipan Føroya í sermálum, lógin um umboðsvald Føroya siga greitt, hvørjar fortreytir skulu vera loknar, áðrenn útreiðslur kunnu verða ávístar úr landskassanum.

Hóast hetta, er sjón fyri søgn, at undanfarin ár hevur skilaloysi valdað á hesum øki, tá hugsað verður um milliónaupphæddirnar í meirnýtslu, sum staðfestar hava verið eftir at avvarðandi fíggjarár varð lokið. Hallið á fíggjarlógunum tey seinastu árini hevur ligið um einar 500 mió. kr., harav ein ikki so lítil partur beinleiðis orsakaður av meirnýtslu.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) hevur áður vist á, at skal talan vera um neyva fíggjarstýring, og skal tingið hava møguleika fyri at vita fíggjarstøðuna í avvarðandi fíggjarári, so er ikki nóg mikið, at cykafíggjarlóg verður framløgd ella fyri tann skuld samtykt fleiri mánaðar eftir, at avvarðandi fíggjarár er lokið.

Slíkur framferðarháttur er í roynd og veru ikki annað enn ein eftirrationalisering og bert ein staðfesting av peninganýtslu, sum longu er farin fram - við ella uttan heimild.

Tað er fegnast yvir, at landsstýrið aftur er farið at leggja cykafíggjarlógir fyri tingið, og somuleiðis er at fegnast yvir, at skattgjaldarans peningur nú tykist at vera neyvari umsitin innan avvarðandi karm, sum løgtingið hevur samtykt.

2. viðgerð 23. februar 1994. Uppskot landsstýrisins við broytingum meirilutans í fíggjarnevndini samtykt við 18-0 atkvøðum.

3. viðgerð 25. februar 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 21-0 atkvøðum.

Lóg nr. 29 frá 4. mars 1994.

63 Avtøka av løgtingslóg um rentuskatt og løgtingslóg um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald

Ár 1993, leygardagin 18. desember legði Edmund Joensen, løgtingsmaður, vegna sambandsflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um avtøku av løgtingslógunum um rentuskatt og um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald.

§ 1.

Løgtingslóg nr. 87 frá 5. juni 1992 um rentuskatt, sum broytt við løgtingslóg nr. 99 frá 18. mai 1993 og løgtingslóg nr. 106 frá 21. mai 1993 og løgtingslóg nr. 192 frá 10. desember 1993 um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald verða settar úr gildi.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ophævelse af lagtingslovene om renteskat og om rentecafgift af finansielle aktiver.

§ 1.

lagtingslov nr. 87 af 5. juni 1992 om renteskat, som ændret ved lagtingslov nr. 99 af 18. maj 1993 og lagtingslov nr. 106 af 21. maj 1993 og lagtingslov nr. 192 af 10. december 1993 om rentecafgift og afgift af finansielle aktiver ophæves.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar

Tað er ein royndur lutur, at tað loysir seg ikki at hava pening innistandandi í føroyskum peningastovnum eftir, at rentuskatturin er hækkaður so nógv, sum hann nú er, og eftir at lógin um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald er sett í gildi. Saman við tí minkandi álitinum, sum innlænararnir av góðum grundum hava til føroysku peningastovnarnar, er ein avleiðingin av, at peningur verður tikin úr føroysku peningastovnunum og í stóran mun plaseraður í útlandinum. Fólk, sum eiga pening innistandandi og samstundis hava tikið lán, velja nú at rinda lánini niður við tí innistandandi peninginum. Alt hetta førir við sær, at aktiviteturin í peningastovnunum minkar, eins og aktiviteturin í samfelagnum øllum dalar við óhugnaligari ferð.

Við eini slíkari gongd og við einum slíkum útliti aftra peningastovnarnir seg eisini at seta rentuna niður, og tað er ein grundleggjandi avgerðandi treyt fyri, at aktiviteturin í samfelagnum aftur fer at mennast.

Tí verður mælt til til, at lógin um rentuskatt og lógin um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald verða settar úr gildi.

Tá tað er hent, fer aftur at vera attraktiv at hava pening standandi í Føroyum, og tað fer eisini at bøta um gjaldførið. Bankaskipanin fer at fáa tað betri, og tað fer at bøta munandi um kappingarførið í allari vinnuni.

Tað uttan samanbering største vandamálið, og tann største hóttanin í føroyska samfelagnum í hesum døgum er rentudeyðin. Privatu sethúsaeigararnir, vinnulívið alt, kommunurnar, SEV, IRF, Hitafelagið o.s.fr., øll líða tey undir rentubyrðini.

Um rentan varð sett munandi niður, hevði alt samfelagið fingið fyrimunir av tí. Bankarnir kundu longt lánstíðina, og við eini lágari rentu upp á eini 4-5% í mun til tað dupulta í dag, kundi hetta gjørt tað, at húsaeigararnir høvdu klárað seg.

Eitt lágt rentustøði hevði fingið ringvirkningar út í alt samfelagið. Keypiorkan hevði vaksið, og tað hevði bøtt munandi um hjá handilsvinnuni og hjá tænastuvinnuni sum heild, handverk, ídnaður, alivinna, sum alt liggur í andaleypi, høvdu fingið fótin fyri seg aftur.

Tað er so tvingandi neyðugt at bøta um kappingarførið hjá vinnuni, so at tað kann koma ein øktur aktivitetur í samfelagið. Tí, sum gongdin er nú, er alt við at steðga upp, og tað hava vit skyldu at forða fyri.

Landskassin hevur eina innanlands lánbyrðu og veðhald, sum gerast effektiv upp á umleið 400 mió. kr. Ein rentulækking hevði spart nógvar milliónir.

Ein avtøka av rentuskattinum hevði merkt eina minninntøku til landskassan upp á 66 mió. kr. og fyri rentuavgjaldið og fíggjarognargjaldið tvær ferðir 70 mió. kr.

Eingin ivi er um, at tann økti aktiviteturin og tað økta kappingarførið hevði givið landskassanum eina munandi hækking í skatta- og avgjaldsinntøkunum. At fleiri fólk komu í arbeiði hevði eisini virkað, at útreiðslurnar til arbeiðsloysisstuðul og til forsorgarhjálp høvdu minkað.

Tað stendur greitt fyri einum og hvørjum, at tann uppsúgvingin av skattum og avgjøldum frá privatpersónum og vinnufyritøkum, sum hend er seinastu tíðina, og sum skal brúkast til at fíggja óproduktivt alment virksemi gjøgnum fíggjarlógina, hevur ført við sær, at alt annað virksemi og serliga tað framleiðsluskapandi so við og við er um at steðga upp. Tí er tað nógv, sum týðir uppá, at tey ráðini til loysn av búskaparkreppuni, sum komin eru uttaneftir, og sum landsstýrið blint eftirlíkar, ikki eru hóskandi at nýta í einum samfelag við okkara vinnustrukturi.

1. viðgerð 2. februar 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av sambandsflokkinum tann 21. desember 1993 og eftir 1. viðgerð 8. februar 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Lasse Klein, Jacob Lindenskov og Heini O. Heinesen) ger vart við, at lógin verður avtikin 31. desember 1994.

Ein minniluti (Jógvan Sundstein) tekur undir við, at lógin um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald verður avtikið beinanvegin. Henda lóg virkar drepandi upp á kapitalvirksemið í Føroyum. Privatur kapitalur rýmir av landinum. Peningastovnarnir rinda dupult avgjald, um teir seta pening inn hjá hvørjum øðrum. Tað verður enn meira vónleyst enn frammanundan at reka bankavirksemi í Føroyum. Minnilutin vísir annars á álit sítt í tingmáli nr. 3/1993: Fíggjarløgtingslóg 1994.

Minnilutin kann ikki taka undir við at avtaka lógina um rentuskatt, men skjýtur upp, at framhaldandi verður arbeitt við málinum um betri symmetri av rentuskatting, sum skotið upp í landsstýrisins uppskoti í tingmáli frá 1992.

Minnilutin (Finnbogi Arge) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 22. februar 1994. Uppskotið fall við 12-0 atkvøðum.

64 Broyting í løgtingslóg um rentuskatt

Ár 1993, týsdagin 21. desember legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um rentuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 5. juni 1992 um rentuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar

1) Í § 2, stk. 1 verður "ella § 2" strikað.
2) Í § 2, stk. 2 verða nøvnini "Føroya Sparikassi, Norðoya Sparikassi, Suðuroyar Sparikassi," strikað.
3) Í § 2, stk. 3 verður orðið "sparikassar," strikað.
4) Í § 3, stk. 1 verður orðið "sparikassum" strikað.
5) Áftaná § 3 verður sum § 3 a sett:
"**§ 3 a.** Kontohavarar, ið hava skyldu at rinda rentuskatt eftir § 2, stk. 3 av rentum av innistandandi í útlendskum peningastovnum, hava skyldu til at geva skattskyldugu rentuinntøkuna eftir hesi lóg upp til skattingar í seinasta lagi 15. februar og 25. august svarandi til rentutilskrivingina pr. 1. januar og 1. juli í sama ári. Uppgerðin yvir skattskyldugu inntøkuna verður latin Toll- og Skattstovuni. Fer rentutilskriving á konto fyri innistandandi í útlendskum peningastovni bert fram eina ferð um árið, er freistin at lata uppgerð inn 15. februar aftaná rentutilskrivingina.

Stk. 2. Toll- og Skattstovan skrivar vegna landskassan út rokning fyri rentuskatt eftir § 2, stk. 3 við forfalsdegi til 1. í mánaðinum eftir, at uppgerðin er latin inn við gjaldsfreist

lagtingslov om ændring i lagtingslov om renteskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 af 5. juni 1992 om renteskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 2, stk. 1 udgår "eller § 2".
2) I § 2, stk. 2 udgår navnene "Føroya Sparikassi, Norðoya Sparikassi, Suðuroyar Sparikassi,".
3) I § 2, stk. 3 udgår ordet "sparekasser".
4) I § 3, stk. 1 udgår ordet "sparekasser".
5) Efter § 3 indsættes som § 3 a:
"**§ 3 a.** Kontohavere, der er pligtige til at betale renteskatt i henhold til § 2, stk. 3 af renter af indeståender i udenlandske pengeinstitutter, har pligt til at opgive den skattepligtige renteindtægt efter denne lov til beskatning senest 15. februar og 15. august svarende til rentetilskrivningen pr. 1. januar og 1. juli samme år. Opgørelsen af den skattepligtige indtægt skal ingives til Toll- og Skattstovan. Såfremt rentetilskrivning på konti for indeståender i udenlandsk pengeinstitut kun er en gang om året, er fristen for indgivelse af opgørelse 15. februar efter rentetilskrivningen.

Stk. 2. På landskassens vegne udskriver Toll- og Skattstovan regning for renteskatt efter § 2, stk. 3 med forfalsdato til 1. i måneden efter, at opgørelsen er sendt ind og med betalingsfrist til 20. i måneden.

til 20. í mánaðinum.

Stk. 3. Verður rentuskatturin ikki goldin landskassanum rættstundis, skal rindast 1,5% í mánaðarligari rentu fyri hvønn byrjaða mánað frá og við forfalsdegnum at rokna."

6) Aftaná § 3 a verður sum § 3 b sett:

"**§ 3 b.** Skattskyldugur eftir § 2, stk. 3 skal í síðsta lagi 1. februar lata Toll- og Skattstovuni uppgerð yvir tær inntøkur, ið skattskyldugi í undanfarna álmanakkarári hevur havt sum avkast av útlendskum virðisbrøvum sbr. § 2, stk. 3.

Stk. 2. Toll- og Skattstovan skrivar út rokning fyri landskassans skattakrøv eftir § 2, stk. 3 sbr. stk. 1 í hesi grein. Skattakrøvini hava forfalsdag 1. í mánaðinum eftir, at uppgerðin er latin við gjaldsfreist til 20. í mánaðinum.

Stk. 3. Verður avgjaldið ikki goldið rættstundis, skal gjaldast 1,5% í mánaðarligari rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá og við forfalsdegnum at rokna."

7) Í § 4 verður sum stk. 2 sett:

"**Stk. 2.** Føroya Gjaldstova kann eftir áheitan frá Toll- og Skattstovuni við panting innheinta landskassans krøv eftir hesi lóg, ið ikki eru goldin rættstundis. "

Stk. 3. Betales renteskatten ikke rettidigt til landskassen, skal der betales 1,5% i månedlig rente for hver påbegyndt måned fra forfalsdagen at regne."

6) Efter § 3 a indsættes som § 3 b:

"**§ 3 b.** Skattepligtig efter § 2, stk. 3 skal senest 1. februar indgive opgørelse til Toll- og Skattstovan over de skattepligtige indtægter vedkommende har haft i det forrige kalenderår som afkast af udenlandske værdipapirer jvf. § 2, stk. 3.

Stk. 2. På vegne af landskassen udskriver Toll- og Skattstovan regning for skattekrav i henhold til § 2. stk. 3 jvf. stk. 1 i denne paragraf. Skattekravene har forfalsdato til 1. i måneden efter at opgørelsen er indsendt og med betalingsfrist til 20. i måneden.

Stk. 3. Betales afgiften ikke rettidigt til landskassen, skal der betales 1,5% i månedlig rente for hver påbegyndt måned fra forfalsdagen at regne."

7) I § 4 indsættes som stk. 2:

"**Stk. 2.** Krav som landskassen har i henhold til denne lov, og som ikke er betalt rettidigt, kan Føroya Gjaldstova efter begæring af Toll- og Skattstovuni indrive ved udpantning."

§ 2.

Hendan lóg fær gildi 1. januar 1994.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1994.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins til broytingar í løgtingslóg nr. 87 frá 5. juni 1992 um rentuskatt og í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt er partvíst tengt at løgtingsmálunum nr. 29/1993 og 30/1993, ið innihalda ásetingar, ið gera sparikassar skattskyldugar av inntøkum vunnar frá og við 1. januar 1994.

Sparikassarnir, sum sostatt higartil hava verið skattafrír hvat viðvíkur vanligum inntøkuskatti,

fingu við løgtingslógini um rentuskatt frá juni 1992 álagt at gjalda rentuskatt av ávísum rentuinntøkum av innistandandi í øðrum peningastovnum og eisini skatt av inntøkum teirra av útlendskum virðisbrøvum. Í løtuni eru satsirnir í rentuskattalógini fyri rentuskatt 22% og av útlendskum virðisbrøvum 18%.

Fyri aðrar peningastovnar er galdandi, at rentuinntøkur teirra -tað veri seg av innistandandi í Føroyum ella í útlandinum - og inntøka í form av avkasti av útlendskum virðisbrøvum, er partur av skattskyldugu inntøkugrundarlagi teirra eftir vanligu reglunum í skattalógini.

Nú sparikassar gerast skattskyldugir, er neyðugt fyri teirra viðkomandi, at tillaga serligu rentuskattaskipanina, so skattingin verður eins av øllum peningastovnum í Føroyum.

Landsstýrið fer tí við hesum at skjóta upp, at serligi rentuskattur verður settur úr gildi fyri sparikassar pr. 1.januar 1994, samstundis sum vanlig skattskylda verður sett í gildi.

Umframt hesa broyting verður skotið upp at seta í gildi neyvari reglur fyri uppgeving, krøvum og innheintingum av bæði rentuskatti og skatti av avkasti av virðisbrøvum. Skipanin, sum bert er relevant í mun til teir grunnar, tryggingarfeløg og stovnar, ið sambært retnuskattalógini hava skyldu sjálvir at geva upp til skattingar rentuinntøku og avkast úr útlandinum, er lík uppgerðarháttunum og innkrevjingarháttinum, ið fyriskrivaðir eru í løgtingsmáli nr. 19/1993 um rentuavgjald og figgjarognaravgjald. Hetta verður skotið upp, so tað í flestu førum kann verða gjørd felags uppgerð fyri bæði rentuavgjald og rentuskatt og eisini í ávísan mun felags uppgerð fyri figgjarognaravgjald av útlendskum virðisbrøvum og skatti av avkastinum eftir hesi lóg.

Landsstýrið fer samstundis eisini at seta úr gildi litra k í § 2, stk. 1 í skattalógini, ið ásetur, at persónar koma undir avmarkaða skattskyldu í Føroyum við at hava innistandandi her. Fyri tað fyrsta so metir landsstýrið, at tað er principielt skeivt, at skatta fólk, sum ikki hava annað tilknýti til Føroyar enn bert tað, at tey hava nakað innistandandi í Føroyum. Harumframt metir landsstýrið, at hendan áseting, ið varð sett í gildi 1. januar 1993, ikki hevur virkað heilt eftir ætlan, og tá umsitingarligu trupulleikarnir tykjast óneyðuga stórir í mun til ta minimalu inntøku landskassin fær av hesi lógarásetingi, verður skotið upp at seta litra k úr gildi.

1. viðgerð 28. desember 1993. Málið varð beint í skattanevndina, sum 24. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 21. desember 1993 og eftir 1. viðgerð 28. desember 1993 beint í skattanevndina.

Nú sparikassar gerast skattskyldugir, er neyðugt fyri teirra viðkomandi at tillaga serligu rentuskattaskipanina, so skattingin verður eins av øllum peningastovnum í Føroyum.

Landsstýrið hevur tí skotið upp, at serligi rentuskatturin verður settur úr gildi fyri sparikassar pr. 1. januar 1994, samstundis sum vanlig skattskylda verður sett í gildi.

Umframt hesa broyting verður skotið upp at seta í gildi neyvari reglur fyri uppgeving, krøvum og innheintingum.

Skattanevndin hevur á fundum viðgjørt uppskot landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 22. apríl 1994. Uppskotið samtykt við 25-0 atkvøðum.

3. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

Lóg nr. 61 frá 10. mai 1994.

65 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1993, týsdagin 21. desember legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.
Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd hendan broyting:
Í § 2, stk. 1 verður litra k strikað.

§ 2.
Hendan løgtingslóg fær gildi 1. januar 1994.

lagtingslov om ændring af lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.
I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændring:
I § 2, stk. 1 udgår litra k.

§ 2.
Denne lagtingslov træder i kraft 1. januar 1994.

Viðmerkingar:
(somu sum í tingmáli nr. 64/1993: Broyting í løgtingslóg um rentuskatt).

1. viðgerð 28. desember 1993. Málið varð beint í skattanevndina, sum 28. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 21. december 1993 og eftir 1. viðgerð 28. december 1993 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og kann taka undir við uppskoti landsstýrisins, men heldur eisini, at tað er neyðugt at fremja aðrar broytingar í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Høvuðstátturin

Nevndin er samd um, at skattatrýstið í Føroyum er ov stórt, men metir eisini, at møguleikarnir fyri at gera størri broytingar eru avmarkaðir, sum samfelagsstøðan er, men nevndin heldur kortini, at teir fyrimunir, sum landskassin annars kann fáa av gongdini í samfelagnum, eiga at koma skattaborgarunum til góðar.

Hóast nevndin hevur arbeitt við avlsum broytingum, hevur tað kortini ikki eydnast at fáa fulla semju millum allar partar um uppskotnu broytingarnar, men metir tað kortini rætt, at tingið fær høvi at taka støðu til, eisini um teir partar í uppskotinum, har full semja ikki er fingin til broytingarnar.

Nevndin hevur í arbeiði sínum miðað fram í móti at fremja hesar broytingar so breitt sum møguligt, so at ikki bert einstakir bolkar faa avgerandi fyrimun av broytingunum, sum skotnar eru upp.

Hetta er eisini orsøkin til, at broytingarnar fevna um viðurskiftini hjá teimum, sum eru í vinnu og teimum, sum orsakað av umstøðunum í samfelagnum, ikki hava arbeiði.

Tí fevna broytingarnar um støðuna hjá teimum gomlu, sethúsaeigarum og fólki, sum hava langa farleið millum bústað og arbeiðsstað, eins og viðmerkingar verða gjørdar til møguleikarnar fyri arbeiðsskapandi tiltøkum.

Arbeiðsskapandi tiltøk

Nevndin heldur, at tað hevur stóran týdning at fáa gongd aftur á vinnuna, og at fólk, sum seta pening í arbeiðsskapandi tiltøk, yvir eitt ávist tíðarskeið fáa møguleika at draga upphæddina frá á sjálvuppgávuni. Hugsað verður um, at øll fólk, sum seta partapening í smápartafeløg ella partafeløg, skrásett í Føroyum, skulu kunna trekkja frá upp til kr. 10.000,00 av á sjálvuppgávuni eitt einstakt ár, og upp til kr. 30.000,00 yvir trý fylgjandi ár. Men av tí at nevndin enn ikki er liðug við at viðgera hesar spurningar til fulnar, mælir nevndin landsstýrinum til at gera metingar av einum tílíkum uppskoti sum hesum.

Ferðing millum bústað og arbeiðsstað

Nú tíðirnar eru truplar hjá fólki, heldur nevndin tað vera rætt, at fólk fáa møguleika fyri at trokkja upphædd av á sjálvuppgávuni fyri ferðing millum bústað og arbeiðsstað, og er hetta gjørt í sama mun, sum gamla skipanin var.

Í hesum sambandi hevur skattanevndin biðið Toll- og Skattstovu Føroya um upplýsingar um, hvat ein slík skipan kostar landskassanum, og hvat hon kostar tí einstaka skattaborgaran í teimum ymsu oyggjunum, t.d. suðuroyingum, norðoyingum og eysturoyingum at koma til og frá bústaði og arbeiðsstað. Men Toll- og Skattstovan sigur frá, at teir ikki beinleiðis eru førir fyri at finna tær umbidnu upplýsingarnar, tí slíkar upplýsingar ikki eru tøkar í skattaskipanini.

Toll- og Skattstovan kann tó upplýsa, hvussu stórur ferðafrádrátturin hevur verið sambært sjálvuppgávuni 1988 - 1992:

	1988	1989	1990	1991	1992
Ferðafrádráttur	9	10	10	11	11

Toll- og skattstovan metir fyri tað fyrsta, at umsitingarligu royndirnar hava sýnt, at ferðafradratturin ikki eigur at verða settur í gildi aftur í sama skapi, sum hesin varð inntil 1. januar 1993, tá ferðafrádrátturin varð settur úr gildi. Hetta kemst av, at í mun til buskaparliga týdningin av ferðafrádráttinum kemur alt ov nógv umsitingarorka at verða nýtt til eftirkannan av viðurskiftum, sum eru avgerandi fyri frádráttin, so sum eftirkannan av ferðaætlan og arbeiðstíð og metan um almanna rutusambandið kann nýtast ella ikki, eisini í mun til, hvat kann góðkennast sum ein hóskandi bíðitíð o.s.fr. Besta dømið um, hvussu flókt umsitingarligu viðurskiftini hava verið av gomlu skipanini, eru tey mongu kærumálini um somu viðurskifti.

Toll- og Skattstovan mælir til, at í staðin fyri gomlu skipanina við ferðafrádrátti verður sett í gildi ein skipan við ferðafrádrátti, har frádrátturin objektiv er tengdur at, hvussu langa vegalongd viðkomandi hevur frá heimi til arbeiðsstað eftir vanligari ferðaleið við bili. Harvið er eisini sagt, at frádrátturin ikki er heilt tengdur, at hvussu tann einstaki veruliga kemur aftur og fram til arbeiðis, og hvussu stór ella ymisk útreiðslan er fyri tann einstaka alt eftir ferðaháttí.

Frádrátturin eigur at verða treytaður av, at tann skattskyldugi yvirfyri skattamyndugleikunum upplýsir talið av arbeiðsdøgum og tal av koyrdum kilometrum pr. arbeiðsdag millum heim og arbeiðsstað. Uttan mun til hvønn flutningsháttí tann skattskyldugi velur, verður farleiðin roknað grundað á tí vanligu ferðaleiðini við bili. Til hesa nýtslu kundi hóskandi í kunngerð verið ásett, at almenna uppmálingin er avgerandi fyri fjarstøðuna. Við vanligari ferðaleið við bili kann tá verða skilt tann vegalongd, sum koyrast skal við bili, tá atlit verður tikið til hesi viðurskifti:

a) givnu geografisku viðurskiftini
b) tíðarnýtslan
c) fíggjarliga rímiligheit (= fíggjarlig líkindi).

Um tann skattskyldugi grundað á hesi viðurskifti á øllum ella parti av farleiðini er noyddur

at nýta ferjusamband, verður ferðafrádrátturin roknaður soleiðis, at tann skattskyldugi kann við skjalprógvi draga frá veruligu útreiðslunum til ferjutransport, tó bert á hægsta avslattarstigi fyri persónin, meðan ferðing á landi fylgir vanligu reglunum.

Øll hesi nevndu viðurskifti eiga at vera neyvari lýst í kunngerð, og er tí í fyrstu syftu bert avgerandi at fáa lýst meginfyritreytirnar fyri frádráttinum í lógini.

Frádrátturin eftir hesum reglum kann bert loyvast í tann mun, dagligu útreiðslurnar til ferðing fara upp um eina upphædd svarandi til útreiðslur til 20 km ferðing pr. arbeiðsdag roknaðeftir vanligu ferðaleiðini. Frádrátturin er tá bert fyri ferðing omanfyri 20 km.

Dømi um rokning av ferðafrádrátti:

Vegalongd aftur og fram millum heim og arbeiðsstað pr. arbeiðsdag	50 km
Herav altíð frádrigið	15 km
Tilsamans frádrátt	35 km

Nevndin heldur tað vera órímiligt, at ávísir partar av landinum skulu hava stórar útreiðslur av at ferðast millum bústað og arbeiðsstað, meðan aðrir ikki skulu hava tað, og mælir tí til, at skipanin verður sett í gildi aftur.

Avgjaldið á brenniolju

Tey seinnu árini eru alsamt fleiri og fleiri byrðar lagdar á fólk, og henda gongdin kann ikki halda fram, og nú peningastovnarnir hava lækkað rentuna, fær landskassin ávísar fyrimunir av hesum, og nevndin heldur tað vera rætt, at skattaborgarin fær fyrimun av hesum.

Sambært útrokningar, sum eru gjørdar, fær landskassin eina meirinntøku av, at peningastovnarnir lækka rentuna upp á uml. 22 mió.kr., sum ikki er roknað við á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1994. Broytingin kostar landskassanum fyri 1994 uml. 10 mió. kr., og er hetta orsøkin til, at ein meiriluti (Lasse Klein, Finnbogi Arge og Svend Aage Ellefsen) mælir til at gera broytingar í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju. Endamálið við hesi broyting er, at avgjaldið á brenniolju skal avtakast. Upphæddin skal minkast við 15 oyru í ár. Spurningurin um oljuavgjaldið eigur at takast upp til viðgerðar á hvørjum ári.

Viðvíkjandi pensjónsupphæddini

Nevndin hevur umrøtt støðuna hjá pensjónistunum og heldur tað vera rætt at koma við uppskoti um, at pensjónistar verða skattafríir av pensjónsgrundupphæddini, men sum m.a. orsakað av hækkingini í kommunuskattaprosentinum hava verið trektir í skatti, sum í fleiri førum hevur tyngt munandi um fíggjarligu umstøðurnar hjá teimum.

Í hesum sambandi bað nevndin í januar mánað Toll- og Skattstovu Føroya um frágreiðing um persónsfrádráttin hjá pensjónistum, tí ynski var í nevndini at taka spurningin upp til viðgerðar.

Tann 19. januar fekk nevndin útrokningar, sum Toll- og Skattstova Føroya hevði gjørt. Í útrokningunum, sum nevndin fekk, var roknað við einum kommunuskattaprosenti upp á 21,5%, sum er roknað til at vera miðalprosent í landinum, og eftir hesum útrokningum skal persónsfrádrátturin vera, um skatturin av grunduppheddini skal vera = 0: hjá giftum kr. 7.878,00 og hjá ógiftum kr. 11.455,00.

Árini frammanundan hevði miðalskattaprocentið hjá pensjónistunum verið útroknað til ávikavist 15% og 18%, fyri at teir skuldu gerast skattafrír.

Tá ið talan hevur verið um skatting av pensjónistum, so hevur politiska fráboðanin verið hon, at teir skuldu gerast skattafrír av pensjónsgrunduppheddini.

Skatting av fólkapensjón:

Viðvíkjandi skatting av pensjónistum mælir ein samd nevnd til, at grunduppheddin verður hildin skattafrí eftir verandi skipan, har frádráttur sambært áseting um í áselingarlógini verður veittur í útroknaða landsskattinum og eftir reglunum í § 47 í skattalógini partvíst eisini í kommunuskattinum, soleiðis at grunduppheddin hjá fólkapensjónistum v.m. í skattaútrokningini gerst skattafrí í eini og hvørji kommunu uttan mun til, hvat kommunuskattaprosentið er í tí einkultu kommununi.

Skipanin skal verða samansett soleiðis, at bert grunduppheddin gerst skattafrí við frádráttinum, men at inntøkan annars telur við í skattskyldugu inntøkuni, soleiðis at onnur inntøka vegna progressiónina í skattastiganum verður skattað hægri enn um grunduppheddin generelt var skattafrítikin.

Skipanin viðførir makað av inntøkumissi hjá landskassanum og kommununum. Í skipanini skal harumframt verða tikin hædd fyri avtaluni millum donsku stjórnina og landsstýrið um at hækkandi kommunuskattaprosent ikki skal minka um skattainntøkurnar hjá landskassanum.

Skattanevndin heldur, at ein tílík skipan kann setast í gildi við at áseta sokallaða pensjónista-frádráttin í § 3 í áseting arlógini til at vera ein upphædd - sum tá endamálið er at halda fólkapensjónsgrunduppheddina skattafría - verður útroknað í mun til skattafyritreytirnar í tí einkultu kommununi, fyri ikki at skapa misjavnar møguleikar við at seta eina generella frádráttarupphædd, sum í eini kommunu kann nýtast til frádrátt í aðrari inntøku vegna lagt kommunuskattaprocent. Við øðrum orðum vil hetta siga, at frádráttarupphædd m.a. kemur at verða tengd at kommunuskattaprosentinum í tí einkultu kommununi og harvið óbeinleiðis eisini at tí ítøkiligu skattingini hjá avvarðandi pensjónisti.

Um frádrátturin ikki rúmast í álíknaða landsskattinum hjá skattgjaldaranum, verður frádrátturin fluttur yvir á kommunuskattin. Í hesum førum er landskassin sambært § 47, stk. 3, við at bera part av inntøkumissinum hjá kommununum, men ongantíð meir enn 16% av skattskyldugu inntøkuni hjá avvarðandi skattgjaldara. Hetta merkir m.a., at kommunur, sum hava hægri skattaprosent enn 16%, kunnu koma at bera ein part av inntøkumissinum av hesi skipan. Møguleikarnir til at flyta frádrátt millum hjúnafelagar verða settir úr gildi, tá teir ikki longur koma at hava aktuellan týdning í og við, at tað bert er grunduppheddin hjá tí einkulta skattgjaldaranum, sum skal haldast skattafrí.

Meginregian er, at frádrátturin verður útroknaður eina ferð árliga, tá landsskattastig og kommunuskattaprosent eru fastsett fyri árið, og verða upphæddirnar síðan ásettar av Liknингarráðnum og kunngjørdar fyri hvørja kommunn sær.

Um skattgjaldari bert hevur rætt til tær viðkomandi almannaveitingarnar ein part av árinum, verður frádrátturin lutfalsliga lækkaður eftir higartil galdandi reglum fyri persónsfrádrátti.

Henda skipan viðførir, at frádrátturin óbeinleiðis ger grunduppheddina skattafría, og merkir hetta sum sagt, at landskassin og kommunurnar verða fyri inntøkumissi.

Teir pensjónistar, sum eisini hava fingið hina sokallaðu "krígspensjónina", hava samstundis mist allan rætt til viðbøtur og eykaviðbøtur, og hetta hevur ført við sær, at fyrimunurin, sum teir annars hava fingið av krígspensjónini, er avmarkaður munandi. Hetta er orsøkin til, at partar av nevndini hildu tað neyðugt, at krígspensjónin ikki varð skattað við meira enn 25%.

Grundgevingin var eisini tann, at henda pensjón ikki er komin í gildi fyri føroyskar pensjónistar fyrr enn 20 - 25 ár aftan á aðrar partar í danska kongaríkinum, og tí varð hildið rætt at fremja eina serstaka skipan á hesum øki.

Skattanevndin hevur biðið Toll- og Skattstovu Føroya gjørt útrokningar av skattaviðurskiftunum hjá niggju pensjónistum, sum eisini fáa krígspensjón. Útrokningin er hjáløgd.

Fyri at lýsa støðuna viðvíkjandi krígspensjónini, er gjørd ein frágreiðing um gongdina.

Viðvíkjandi krígspensjón

Sambært bókhaldinum hjá Toll- og Skattstovuni eru hesar flytingar viðvíkjandi krígspensjón í 1993 og 1994 (til og við 15. apríl 1994):

Tal av persónum	Upphædd	
1993	449	43.360.702,00
1994	551	22.292.748,00

Sambært upplýsingum frá Arbejdsskadestyrelsen Ole Behn, Almannastovuni Karsten Saxov og Toll- og Skattastovuni Kurt Madsen, eru eingi hagtøl til skjals í løtuni, sum nágreiniliga lýsa onnur tøl, sum verða nevnd niðanfyri, men eftir leiðbeining verður nett, at tølini eru so nær veruleikanum, sum komast kann í verandi støðu.

Ole Behn frá Arbejdsskadestyrelsen upplýsir, at teir hava fingið umleið 1.000 umsoknir um krígspensjón úr Føroyum, harav eru 551 avgreiddar, og 200 umsøkjarar luka ikki treytirnar, sum eru settar fyri at fáa pensjón. Eftir eru at avgreiða 249 umsóknir, sum verða avgreiddar so hvørt, t.v.s. at 800 føroyingar hava og fáa rætt til krígspensjón.

Í 1994 roknar Arbejdsskadestyrelsen við, at útgjalda 65.500.000,00 í vanligari krígspensjón, aftrat hesum koma tey, sum framvegis ikki eru avgreidd.

Útgjald og skattur av krígspensjón

Arbejdsskadestyrelsen upplýsir, at 50% av teimum 800, sum fáa krígspensjón, eru einkjur, og fáa tær eitt útgjald upp á kr. 9.300,00 pr. mðr. Miðalútgjaldið til aðrar er upp á kr. 4.000,00 pr. mðr, meðan fyrsta útgjaldið er millum kr. 30.000,00 og kr. 150.000,00. Í hesi útrokning er miðaltalið kr. 70.000,00 brúkt. Upphæddirnar eru hesar:

	Útgjald	Skattur
9.300,00 x 400 x 12	44.640.000,00	19.641.600,00
4.000,00 x 400 x 12	19.200.000,00	8.448.800,00
	62.880.000,00	28.090.400,00
70.000,00 x 249(eft.at avgr.)	17.430.000,00	9.586.500,00
Ella í alt 1994	80.310.000,00	37.676.900,00

Meirinntøka av fólkapensjónini

Útrokningarnar av skattinum hjá pensjónistum, sum eisini fáa krígspensjón, er í miðal fyri einkjur kr. 1.000,00 pr. mðr. av fólkapensjónini, og í miðal fyri onnur kr. 800,000 pr. mðr., t.v.s. at meirinntøka landskassans av hesum er

Fyri einkjur 1.000,00 x 400 x 12	4.800.000,00
Fyri onnur 800,00 x 400 x 12	3.840.000,00
Meirinntøka landskassans fyri 1994 av fólkapens.	8.640.000,00

Nakrir pensjónistar av teimum, sum fáa krígspensjon, eru undir 70 ár, og sambært galdandi lóg, um pensjónisturin hevur inntøku umframt pensjónina, verður pensjónin lækkað, og hjá einstøkum av teimum, sum fáa krígspensjón, er fólkapensjónin minkað munandi. Í hesum útrokningunum er ikki tikið hædd fyri sparingum landskassans orsakað av hesi støðu.

Missa rættin til pensjónsviðbót

Um pensjónistur hevur inntøku umframt pensjónina, fella viðbøturnar burtur, og sparingarnar hjá landskassanum orsakað av hesi støðu eru hesar:

Einkjur	735,00 x 400 x 12	3.528.000,00
Onnur (hjun)	584,00 x 500 x 12	2.920.000,00
		6.448.000,00
Brenni- og samskiftisstndningur	1.569,00 x 600	941.400,00
falt		7.389.400,00

Sambært upplýsingum frá Almannastovuni eru tað fáir pensjónistar, sum hava havt aðra inntøku enn fólkapensjónina, men hóast hetta, so er talið onnur sett til 500, hóast tað kundi verið sett til 800, og tey, sum fáa brenni- og samskiftisstudning, sett til 600. Hetta fyri ikki at yvirmeta landskassans fyrimun í samband við landskassans fyrimun.

Teir pensjónistar, sum nú eisini fáa krígspensjón, missa eftir galdandi lóg eisini rættin til at søkja um stuðul til aðrar viðbøtur, talan er um medisin, brillur, sjúkraferðir, gebis og heimahjálp. Mett verður at landskassans sparing er upp á umleið: 1.000.000,00

Skattur, um eingin krígspensjón var

Útrokningin av vanliga skattinum, um so var, at eingin krígspensjón var, vísa, at pensjónistarnir guldu í miðal kr. 400,00 pr. mðr., og úrslitið var hetta:

800 pensjonistar x 400,00 x 12	3.840.000,00

Meirinntøkur landskassans av krígspensjónini

Ongastaðni í skjølunum til figgjarlógina sæst, at hædd er tikin fyri meirinntøku landskassans fyri 1994, hvørki í framløgdu skjølum ella øðrum skjølum, sum figgjarnevndin hevur havt um hendi, tá uppskotið var til viðgerðar, á síðu 4 í uppskoti nevndarinnar er vanligi skatturin lækkaður við kr. 67.000.000,00 í mun til uppskot landsstýrisins. Heldur ikki undir viðgerðunum var hesin spurningur avgerandi borin upp á mál.

Landskassin hevur fingið hesar fyrimunir av krígspensjónini:

Skattur av krígspensjónini	37.676,900,00
Meirinntøka landskassans av fólkapensjónini	8.640.000.00
Minni útreiðslur av pensjónsviðbót	7.389.400.00
Minni útreiðslur til aðrar viðbøtur	1.000.000,00
	54.706.300,00
Vanligur skattur	3.840.000,00
Meiriinntøka landskassans fyri 1994	50.866.300,00

Kanningin

Lasse Klein ger vart við, at í sambandi við støðuna hjá pensjónistunum, er kanning gjørd, har teir fingu høvi at svara ávisum spurningum, og hóast kanningin kundi verið gjørd nágreiniligari, hevur hon kortini ábending um tey kor, sum pensjónistarnir liva undir í dag.

Ialt svaraðu 222 pensjónistar spurningunum, og kunnu teir býtast upp í tríggjar partar:

Krígspensjón, menn	46
Krígspensjón, einkjur	58
Aðrir pensjónistar	118
	222

Roknast kann við, at 800 fólk í Føroyum fáa krígspensjón. 551 hava fingið, og av teimum hava 104 svarað spurnarblaðnum, ella 18,8%. Arbejdsskadestyrelsen hevur 249 umsóknir eftir at avgreiða, sambært upplýsingum frá teimum.

Krígspensjónistar, menn

Hóast tað altíð er órættvíst at taka einstakar mánaðir burtur úr heildini, so verður hetta kortini gjørt. Kanningin byggir á inntøkuna yvir tríggjar mánaðir. Men her skulu nevnast trý dømi:

Dømi I (1915):

Inntøka fólkapen. 3.982,00-skattur 2.269,00 =	1.713,00	
Inntøka krígspen. 5.208,00-skattur 2.968,00 =	2.240,00	
	3.953,00	
Pensjón áðrenn 4.717,00-skattur 298,00=	4.419,00	
Minniinntøka (av eini meiriinntøku upp á kr.5.208,00)	466,00	

Dømi II (1920)

Inntøka fólkapen. 3.164,00-skattur 1.803,00=	1.361,00	
Inntøka krígspen. 4.240,00-skattur 1.040,00=	3.200,00	4.561,00
Pensjón áðrenn 3.749,00-skattur 310,00		3.439,00
Meirinntøka (av eini meirinntøku upp á kr. 4.240)		1.122,00

Dømi III (1923)

Inntøka fólkapen. 3.324,00-skattur 846,00=	2.478,00	
Inntøka krígspen. 3.720,00-skattur 1.964,00=	1.756,00	4.234,00
Pensjón áðrenn 3.749,00-skattur 304,00=		3.445,00
Meirinntøka (av eini meirinntøku upp á 3.720,00)		789,00

Tað kann tykjast ósakligt at taka slík dømir úr rúgvuni, men talan er um tilvildarlig vald dømir. Hini spurnarbløðini hava somu ábending.

Krígspensjón, einkjur

Tær 58 einkjurnar, sum svaraðu fyrispurninginum, vóru stórt sæð betur fyri enn menninir, men kortini var stórur munur á útgjaldunum. Her eru tvey dømi úr rúgvuni:

Dømi I (1909):
Inntøka fólkapen. 4.310,00-skattur 2.269,00= 2.041,00
Inntøka krígspen. 9.300,00-skattur 4.301,00= 4.999,00 7.040,00

Pensjón áðrenn 4.717,00-skatttur 357,00= 4.360,00
Meirinntøka (av eini meirinntøku upp á 9.300,00) 2.680,00

Dømi II (1920):
Inntøka fólkapen. 3.982,00-skattur 2.269,00= 1.713,00
Inntøka krígspen. 9.300,00-skattur 5.301,00= 3.999,00 5.712,00

Pensjón áðrenn 4.717,00-skattur 367,00= 4.350,00

Meirinntøka (av eini meirinntøku upp á 9.300,00) 1.362,00

Aðrir pensjónistar og heildin

Meirilutin visir á, at tað, sum kann sigast felags fyri tey fólkini, sum fáa krígspensjón, tað er, at tey hava øll mist rættin til pensjónsviðbótina, brenni- og samskiftisstuðulin og allar aðrar viðbøtur, og at tey flestu vóru skattað við 57% av krígspensjónini, og nakað minni av pensjónsupphæddini.

Teir 118 pensjónistarnir, sum ikki fingu krígspensjón, gjørdu vart við, at tey høvdu trupulleikar at fáa endarnar at røkka saman. Tær føstu útreiðslurnar vóru dýrkaðar munandi orsakað av meirvirðisgjaldinum, umframt kostnaðinum til medisin og heimahjálp.

Av kanningini gekk fram, at ávísir pensjónistar eru í svarum fíggjarligum trupulleikum og eiga at fáa hjálp í skundi.

Ein meiriluti (Lasse Klein, Finnbogi Arge og Svend Aage Ellefsen) mælir í fyrsta umfari til at samtykkja hetta

1 Broytingaruppskot

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 29, nr. 13 verður orðað soleiðis:
"ellisviðbót eftir § 10, persónlig viðbót eftir § 14, hjálpar- og røktar- og avlamisviðbót eftir § 16 og grundupphæddin sbrt. § 3 fyri persónar, ið hava fylt 67 ár eftir løgtingslóg nr. 58 frá 15. mars 1967 um fólkapensjón við seinni broytingum, jbr. tó 2. punktum, avlamisgjøld eftir § 4, stk. 2, hjálpar- og røktarviðbót

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 29, nr. 13 formuleres således:
"alderstillæg efter § 10, personligt tillæg efter § 14, bistand, pleje, og invaliditetstillæg efter § 16 og grundbeløbet i henhold til § 3 for personer, der er fyldt 67 år efter lagtingslov nr. 58 af 15. marts 1967 om folkepension med senere ændringer, jfr. dog 2. punktum, invaliditetsydelser efter § 4, stk. 2,

eftir § 11, persónlig viðbót eftir § 15, avlamisveiting, hjálpar- og røktarviðbót hartil eftir § 16, veitingar eftir §§ 9, 15, 16, 17 og 18 og persónligar viðbøtur eftir § 13, stk. 2 g § 29, stk. 2 í lóg nr. 56 frá 15. mars 1967 um almenna forsorg við seinni broytingum. Grunduppheddin hjá persónum, ið fáa frádrátt sbrt. § 33, nr. 12, verður skattafrí árið eftir, at hesir eru fyltir 67 ár,"

2) Sum nýggj § 33, nr. 12) verður sett:
"Hjá persónum, sum fáa framskundaða fólkapensjón, og persónum, sum fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, ein pensjónistafrádráttur. Fyri giftar persónar er frádrátturin tann sami sum fólkapensjónsgrunduppheddin fyri giftar persónar. Fyri stakar persónar er frádrátturin tann sami sum fólkapensjónsgrunduppheddin fyri stakar persónar. Til nýtslu í fyrisitingini av frádráttinum siga Almannastovnar og aðrir almennir myndugleikar eftir tørvi Toll- og Skattstovu Føroya frá broytingum í fólkapensjónsuppheddunum, og hvørjir persónar eru fevndir av 1. punktum. Frádrátturin verður javnaður eftir grunduppheddini av fólkapensjónini pr. 1. oktober, sum galdandi fyri komandi inntøkuár."

bistands- og plejetillæg efter § 11, personligt tillæg efter § 15, invaliditetsydelse, bistands- og plejetillæg efter § 16, ydelser efter §§ 9, 15, 16, 17 og 18 og personlige tillæg efter § 13, stk. 2 og § 29, stk. 2 i lov nr. 56 af 15. marts 1967 om offentlig forsorg med senere ændringer. Grundbeløbet for personer der får fradrag i henhold til § 33, nr. 12, bliver skattefrit året efter, at disse er fyldt 67 år,"

2) Som ny § 33, nr. 12) indsættes:
"For personer, der får fremskyndet folkepension, invaliditets- og enkepension, og personer, der får bistand i henhold til § 13 i forsorgsloven, et pensionstfradrag. For gifte personer er fradraget det samme som folkepensionsgrundbeløbet for gifte personer. For enlige personer er fradraget det samme som folkepensionsgrundbeløbet for enkelte personer. Til brug for administrationen af fradraget oplyser "Almannastovnar" og andre offentlige myndigheder efter behov "Toll- og Skattstova Føroya" om ændringer i folkepensionsgrundbeløbene, og hvilke personer, der omfattes af 1. punktum. Fradraget jævnes efter folkepensionens grundbeløb pr. 1. oktober, som gældende for kommende indtægtsår."

Um uppskot meirilutans ikki verður samtykt, setir **ein samd nevnd** fram eitt soljóðandi

II broytingaruppskot

til

løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verða gjørdar hesar

lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om udskrivning af skat til landskassen med senere ændringer foretages følgende æn-

broytingar:

1) § 3, stk. 3, verður orðað soleiðis:
"Frádráttirnir eftir stk. 1 og stk. 2 verða ásettir árliga til tær frádráttarupphæddir, ið halda fólkapensjónsgrunduppháddina skattafrían uttan mun til, hvør bústaðarkommunan er, jbr. tó § 47, stk. 2 og 3 í skattalógini. Tá landsskattastigin og kommunuskattaprosentini fyri álmanakkaárið eru fastsett, verða frádráttaruppháddirnar fastsettar og kunngjørdar av Líkningarráði Føroya, sum galdandi fyri avvarðandi álmanakkaári. Broyting í frádráttaruppháddunum fer annars bert fram, um grunduppháddin, landsskattastigin ella kommunuskattaprosentið verða broytt. Um slíkar broytingar fara fram, er broytingin í frádráttaruppháddunum tengd at, um viðkomandi broytingarnar hava gildi fyri alt álmanakkaárið ella bert part av hesum."

2) § 3, stk. 4, verður strikað.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. Lógin fær fyrstu ferð gildi fyri álmanakkaárið 1994. Frádráttartølini fyri 1994 verða ásett í mun til gaidandi skattareglur.

dringer:

1) § 3, stk. 3, affattes således:
"Fradragene efter stk. 1 og stk. 2 fastsættes årligt til de fradragsbeløb, der holder folkepensionsgrundbeløbet skattefrit, uanset hvilken kommune er bopælskommune, jvf. dog § 47, stk. 2 og 3 i skatteloven. Når landsskatteskalaen og kommuneskatteprocenterne for kalenderåret er fastsat, fastsættes og bekendtgøres fradragsbeløbene af Færøernes Ligningsråd, som gældende for pågældende kalenderår. Ændring i fradragsbeløbene foretages ellers kun i forbindelse med ændringer i grundbeløbet, landsskatteskalaen eller kommuneskatteprocenterne. Ifald at sådanne ændringer foretages, afhænger ændringerne i fradragsbeløbet af, om de pågældende ændringer har virkning for hele kalenderåret eller kun en del af dette."

2) § 3, stk. 4 ophæves.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelse.
Stk. 2. Loven får første gang virkning for kalenderåret 1994. Fradragsbeløbene for 1994 fastsættes ud fra gældende skatteregler.

III Broytingaruppskot

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:
1) Í § 33 verður sum nýtt nr. 13 sett:
"hjá persóni undir fullari skattskyldu, sum hevur lønarinntøku, herundir fiski- og útróðrarpart, ein upphædd í sambandi við ferðing millum bústað og arbeiðsstað eftir reglunum í litra

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:
1) I § 33 indsættes som nyt nr. 13:
"hos en person under fuld skattepligt, der har lønindtægt, herunder indtægter ved partsfiskeri et beløb i forbindelse med befordring mellem bopæl og arbejdsplads efter efter

a-e:

a) Frádrátturin verður veittur við eini upphædd, sum verður roknað grundað á vanligu ferðaleiðina millum heim og arbeiðspláss við bili eftir einum kilometurtaksti, sum verður ásettur av Líkningarráð Føroya. Tá upphæddin verður ásett, verða útreiðslur til ferðing við bili lagdar til grund fyri ásetingina.

b) Frádráttur kann tó bert veitast fyri tann partin av ferðaleiðini, sum aftur og fram pr. arbeiðsdag er hægri enn 15 kilometrar.

c) Fyri ferðing sjóvegis millum bústað og arbeiðsstað verður frádrátturin loyvdur svarandi til ferðakostnaðin á hægsta avlátt-arstigi fyri persón uttan flutningstól.

d) Landsstýrið kann áseta neyvari reglur um fyrisitingina av hesum reglum, herundir reglur um, hvussu vanliga ferðaleiðin verður fastløgd.

e) Verður móttikið fult ella partvíst ferðaendurgjald eftir § 29, nr. 7, kann frádráttur ikki veitast eftir hesum reglum fyri ta ferðing, ið er grundarlag fyri ferðaendurgjaldinum.

2) Í § 47, stk. 3, verður "15%" broytt til: "16%".

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er lýst, og er galdandi frá og við inntøkuárinum 1994.

reglerne i litra a-c:

a) Fradraget ydes for befordring frem og tilbage mellem sædvanlig bopæl og arbejdsplads og foretages med et beløb, som beregnes på grundlag af den normale transportvej ved bilkørsel efter en kilometertakst, der fastsættes af Ligningsrådet. Ved fastsættelse af denne takst lægges udgiften til befordring med bil til grund.

b) Fradrag kan dog kun foretages for den del af befordringen, som frem og tilbage pr. arbejdsdag overstiger 15 kilometer.

c) For befordring ad søvejen mellem bopæl og arbejdsplads tillades et fradrag, der svarer til billetpris med størst rabat for person uden befordringsmiddel.

d) Landsstyret kan fastsætte nærmere regler om administartionen af disse regler, herunder regler om, hvordan den normale transportvej fastlægges.

e) Modtages hel eller delvis skattefri befordringsgodtgørelse efter § 29, nr. 7, kan der ikke foretages fradrag for den befordring, der har dannet grundlag for godtgørelsen.

2) I § 47, stk. 3 ændres "15%" til: "16%".

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen og har virkning fra og med indtægtsåret 1994.

IV Broytingaruppskot

til

løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

§ 3 verður strikað.

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1994.

lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om udskrivning af skat til landskassen med senere ændringer foretages følgende ændring:

§ 3 udgår.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1994.

V Broytingaruppskot

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 179 frá 18. desember 1992 um serligt avgjald á brenniolju verður gjørd henda broyting:

Avgjaldið til landskassan, sum er ásett í § 1, stk.1, verður lækkað við 0,15 kr. pr. litur pr. 1. juni 1994.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 1.

I lagtingslov nr. 179 af 18. december 1992 om særlig afgift på brændselolie foretages følgende ændring:

Afgiften til landskassen der er fastsat i § 1, stk 1, reduceres med 0,15 kr. pr. liter pr. 1. juni 1994.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

2. viðgerð 9. mai 1994. Uppskot landsstýrisins samtykt við 27-0 atkvøðum. Broytingaruppskotini I og II fullu við 15-0, III fall við 14-0, IV fall við 15-0 og V fall við 14-0 atkvøðum.

3. viðgerð 11. mai 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

Lóg nr. 79 frá 25. mai 1994.

RED: 10 X



Nasjonalbiblioteket

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 22





RED: 10 X



Nasjonalbiblioteket

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 22

LØGTINGS-TIDINDI

1993

66 Ígildissetan fyri Føroyar av "lov om Industriministeriets Erhvervsankenævn

Ár 1993, týsdagin 21. desember legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 858 frá 23. desember 1987 "om Industriministeriets Erhvervsankenævn" verður sett í gildi fyri Føroyar.

Viðmerkingar:
Um ríkisumboðið hevur Iðnaðarmálaráðið biðið um viðmerkingar heimastýrisins viðvíkjandi ígildissetan fyri Føroyar av lóg nr. 858 frá 23. desember 1987 "om Industriministeriets Erhvervsankenævn".

Í teimum vinnulógum, ið við kongaligari fyriskipan vórðu settar í gildi fyri Føroyar fyrr í ár er ásett, at ávísar avgerðir, ið eru tiknar av føroyska skrásetingarmyndugleikanum, kunnu kærast til nevnda "Erhvervsankenævn", og er fyrispurningurin frá Iðnaðarmálaráðnum ein natúrlig avleiðing av hesum.

1. viðgerð 28. desember 1993. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 15. februar 1994 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 21. december 1993 og eftir 1. viðgerð 20. december 1993 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og **ein samd nevnd** mælir til at samtykkja málið um, at danska lógin frá 1987 um "Industriministeriets Erhvervsankenævn" verður sett í gildi í Føroyum, so leingi eingin samsvarandi kærunevnd er í Føroyum.

2. *viðgerð 17. februar 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.*

67 Skipan millum Føroyar og ES um sínámillum fiskirættindi í 1994

Ár 1993, týsdagin 28. desember, legði løgmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið viðløgdu skipan, dagfest 1. oktober 1993, um sínámillum fiskirættindi í 1994 Føroya og ES millum.

Viðmerkingar:

1. Tann 30. september og 1. oktober 1993 vóru samráðingar millum umboð fyri Føroya landsstýri og ES-nevndina í Tórshavn um sínámillum fiskirættindi í 1994. Úrslitið av samráðingunum er hjálagda skipan, undirritað í Tórshavn 1. oktober 1993.

2. Sáttmálin fyri 1994 javnvigar á sama støði í toskavirði sammett við sáttmálan fyri 1993.

3. Loyvdu veiðunøgdirnar í 1994 av ósløgdum fiski eru hesar:

Hjá ES-skipum á føroysku landleiðini:

Tonsini av botnfiski, svartkjafti og makreli verða í 1994 (1993-tøl í klombrum, har broytingar eru):

500	tons av	toski og hýsu
2.500	-	upsa
7.000	-	kongafiski
3.600	-	blálongu og longu (íroknað stinglaks og langasporl)
1.000	-	flatfiski (svartkalvi íroknaður)
760	-	ymiskum fiskasløgum
25.000	-	svartkjafti
5.770	-	makreli

Hjá føroyskum skipum í ES-sjógvi:

(a) 800 tons tilsamans av longu, brosmu og blálongu á Rock All-leiðini at veiða við línu. Loyvt er eisini at veiða 400 tons av ymiskum botnfiski sum hjáveiðu í ídnaðarfiskiskapi; í 1993 vóru nøgdirnar tær somu. Eisini er loyvt at veiða 940 tons av blálongu við troli á havleiðunum vestan fyri Skotland.

(b) 6.930 tons av tí vestara makrelstovninum. Roknað verður við, at Føroyar fáa loyvi at veiða 1.000 tons av kvotuni fyri 1994 eystan fyri 4°V, vísandi til stk. 2 í váttaðu frásøgnini frá samtáðingunum í Tórshavn.

(c) 7.000 tons av rossamakreli.

(d) 20.000 tons av íðnaðarfiski umfatandi hvítingsbróður, nebbasild, hjáveiðu av svartkjafti og íroknað hægst 2.000 tons av brislingi.

(e) 660 tons av sild vestan fyri Skotland.

(f) 62.000 tons av svartkjafti. Í veiðuni av svartkjafti er loyvt at hava hjáveiðu av gulllaksi, sum ikki slepst undan.

(g) 500 tons av sild í Skagerak.

(h) 125 tons av hemara í øllum EEC-sjógvi. Tó ikki í NAFO 3 PS (St. Pierre og Miquelon).

Hjá føroyskum skipum í grønlendskum sjógvi (samb. § 1 (3) í fiskisáttmálanum millum EF og Grønland).

(i) 1.150 tons av rækjum í Eysturgrønlandi í ICES-øki XIV/V.

(j) 150 tons av svartkalva undir Vesturgrønlandi NAFO-øki 0/1 og 150 tons undir Eysturgrønlandi ICES-øki XIV/V.

(k) Eisini verður loyvt at veiða 500 tons av kongafiski undir Eysturgrønlandi ICES-øki XIV/V (Eysturgrønland).

(l) Loyvt er í 1991 at veiða 10.000 tons av lodnu við Eysturgrønland ICES-øki XIV/V.

Vísandi til stk. 2 í váttaðu frásøgnini er á sama hátt sum árini undan grundarlagið undir semjuni um makrel, at ein heildarkvota verður avtalað millum Noreg, EF og Føroyar. Fer heildarkvotan upp, so fáa Føroyar eisini størri part.

Reglurnar fyri fiskiskapi eru óbroyttar í 1994 bæði hjá ES og Føroyum. Føroyski parturin boðaði ES-partinum frá, at føroyska kassaskipanin fór at verða broytt, og at ES-skip koma undir hesar broytingar.

Váttaða frásøgnin týdd til føroyskt og allur sáttmáiin fyri 1994 á enskum eru løgd hjá.

1. viðgerð 25. januar 1994. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 24. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 28. desember 1993 og eftir 1. viðgerð 25. januar 1994 beint í marknaðarnevndina.

Landsstýrið hevur sama dag - 27. desember 1993 - sent løgtinginum soljóðandi skriv:

> "Viðvíkjandi makrelkvotuni smb. avtaluni um sínámillum fiskirættindi Føroyar og ES fyri 1994.
>
> Eftir at fiskivinnuavtalan Føroyar ES fyri 1994 varð løgd fyri landsstýrið, er fráboðan komin um, at 'TAC'ið fyri makrel í 1994 er hækkað úr teimum 461.050

tonsunum, sum nevnd eru í avtaluni, í 493.250 tons.

Sambært grein 2.2 í avtaluni verður føroyska makrelkvotan í ES-sjógvi sostatt 7.410 tons í 1994, harav 1.000 tons kunnu veiðast eystanfyri 4°V í tíðarskeiðinum 1. oktober til 31. december 1994.

Makrelkvotan hjá ES á føroyskum sjóøki verður 6.170 tons í 1994."

Ein samd nevnd mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 7. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

FL jnr. 1555-5/90.

68 Ígildissetan fyri Føroyar av "Anordning om ændring af anordning om ikrafttræden for Færøerne om visse selskabers aflæggelse af årsregnskab m.v.

Ár 1993, týsdagin 28. desember legði løgmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at "Anordning om ændring af anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse selskabers aflæggelse af årsregnskab m.v." verður sett í gildi fyri Føroyar.

Viðmerkingar:

Um ríkisumboðsmannin hevur landsstýrið fingið fyrispurning frá ríkisstjórnini um støðu heimastýrisins til uppskot til broytingarfyriskipan viðvíkjandi árskoknskaparlógini. Broytingin er rætting av prentvillu í § 67 í fyriskipan nr. 248 frá 3. mai 1993. Landsstýrið hevur samtykt at mæla til at seta broytingina í gildi í Føroyum.

Málið verður við hesum lagt fyri løgtingið.

1. viðgerð 18. januar 1994. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 27. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 28. desember 1993 og eftir 1. viðgerð 18. januar 1994 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og sett landsstýrinum fyrispurning um, hvør orsøkin er til hesa rætting, ið nú er løgd fyri tingið.

Tommy Petersen, fulltrúi, hevur upplýst, at lógin um "visse selskabers aflæggelse af årsregnskab", varð sett í gildi í fjør, og hevur tann danska umsitingin sett í lógina aftur nakrar gamlar skiftisreglur, ið ikki samsvara við restina av lógini, sum er galdandi í Føroyum. Orðingin nú røkkur teimum endamálum um tryggari ársroknskaparviðurskifti, ið landsstýrið tá ynskti at seta í gildi eftir avtalu við ríkisstjórnina.

Ein samd rættarnevnd mælir løgtinginum til at samtykkja málið.

2. viðgerð 28. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

69 Tryggingarlóggávan

Ár 1993, týsdagin 28. desember legði løgmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um tryggingarvirksemi

Løgtingið samtykkir viðlagda uppskot til løgtingslóg um tryggingarvirksemi (skjal A).

Viðmerkingar:
Landsstýrið setti í 1986 eina nevnd at kanna føroysku tryggingarlóggávuna og tryggingarviðurskiftini.

Í oktober 1989 sendi nevndin landsstýrinum eitt ávegis álit og vísti á 4 møguleikar at velja ímillum viðvíkjandi broyting á tryggingarøkinum.

Møguleikarnir, ið víst varð á, vóru hesir:

Møguleiki I	Frí kapping millum føroysk skrásett feløg við føroyskum kapitali.
Møguleiki II	Frí kapping millum núverandi tryggingardeildir í sambandinum.
Møguleiki III	Núverandi bygnaður heldur fram.
Møguleiki IV	Samanlegging av samtakinum til eitt stovn.

Landsstýrið heitti í skrivi dagfest 1. mars 1990 á nevndina um at fáa at vita, hvønn møguleika nevndin mælti til at velja.

Í skrivi dagfest 9. juli 1990 mælti nevndin til at velja møguleika I: Fría kapping millum føroysk skrásett feløg við føroyskum kapitali.

Í avtalum við ríkisstjórnina hevur landsstýrið bundið seg til at dagføra tryggingarlóggávuna og at leggja uppskot fyri løgtingið innan árið er úti.

Landsstýrið tekur undir við uppskotinum frá nevndini og leggur við hesum uppskotið við tilhoyrandi viðmerking fyri tingið.

1. viðgerð 25. januar 1994. Málið varð beint í Iðnaðarnevndina. Burturdottið vegna samgonguslit.

70 Broytingar í tryggingaravtalulógini

Ár 1993, týsdagin 28. desember legði løgmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at fylgjandi ríkislógir um broytingar í tryggingaravtalulógini verða settar í gildi í Føroyum:

1) **Lóg nr. 50 frá 24. februar 1960 "om ændringer i forsikringsaftaleloven",**
2) **lóg nr. 179 frá 24. mai 1992 "om ændring i lov om forsikringsaftaler".**
3) **§ 2 í lóg nr. 212 frá 26. apríl 1973 "om ændring af købeloven, forsikringsaftaleloven og gældsbrevloven",**
4) **§ 2 í lóg nr. 618 frá 19. desember 1984 "om ændring af lov om renter ved forsinket betaling, forsikringsaftaleloven m.v."**
5) **§ 3 í lóg nr. 826 frá 18. desember 1991 "om ophævelse af lov om tilsyn med begravelseskasser og ligbrændingsforeninger og om ændring af forskellige lovbestemmelser" og**
6) **§ 2 í lóg nr. 262 frá 6. mai 1993 "om ændring af lov om visse forbrugeraftaler og lov om forsikringsaftaler".**

Viðmerkingar:
Meðan lógarøkið um tryggingarvirksemi er yvirtikið sum føroyskt sermál, er avtalurætturin og herundir avtalur um tryggingar eitt ríkismál.

Galdandi lóg í Føroyum á hesum øki er ríkislóg nr. 129 frá 15. apríl 1930 við 3 seinri broytingum.

Í avtalum við stjórnina hevur landsstýrið bundið seg til at dagføra tryggingarlóggávuna. Nýggj lóg um tryggingarvirksemi verður framløgd í øðrum tingmáli.

Viðmerkingar til tær einstøku lógarbroytingarnar:

1) Lóg nr. 50/1972
Henda lógarbroyting stendst av, at tryggingaravtalulógin verður sett í gildi í Grønlandi. Eftir broytingarlógini verða freistir, ið eru longri enn vanligt, ásettar, um tryggingartakarin býr í Grønlandi.

2) Lóg nr. 179/1972
Í hesi lógarbroyting verður ásett, at tær longru freistirnar, ið galdandi eru um tryggingartakarin er búsettur í Grønlandi, ikki eru galdandi fyri sjópantikrøv.

3) Lóg nr. 212/1973
Eftir hesi lógarbroyting verða rentusatsirnir fyri ov seint goldið endurgjald ella tryggingargjald broyttir og knýttir at diskonto Tjóðhankans (diskontuin + 2 %)

4) Lóg nr. 618/1984
Eftir hesi lógarbroyting verður rentusatsurin aftur broyttur og settur at vera diskontoin hjá Tjóðbankanum + 5 %. Framvegis kann rentan broytast eftir avtalu við búskapar-málaráðið.

5) Lóg nr. 826/1991
Eftir hesi lógarbroyting fevnir tryggingaravtalulógin ikki longur um jarðarferðarkassar.

6) Lóg nr. 262/1993
Eftir lógarbroytingini kunnu tryggingartakarar siga seg leysar av eini tryggingaravtalu, um teir innan 14 dagar boða frá, at teir angra gjørdu avtaluna.

1. viðgerð 25. januar 1994. Málið varð beint í lðnaðarnevndina. Burturdottið vegna samgonguslit.

71 Regulering av veiðuni av laksi í 1994 sambært viðtøkunum í Norðuratlantisku Laksakonventiónini (NASCO)

Ár 1993, týsdagin 28. desember legði løgmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið tekur til eftirtektar samtyktina á NASCO ársfundinum í juni 1993 um reglur fyri fiskiskapinum eftir laksi á ytru føroysku landleiðini.

Viðmerkingar:

Nevndin fyri landnyrðingspartin av Atlantshavi hjá Laksakonventiónini í Norðuratlantshavi (NASCO) hevði fund í Edingburgh í Skotlandi 7. - 10. juni 1993. Á fundinum vórðu samtyktar reglur fyri fiskiskapin eftir laksi undir Føroyum í árinum 1994.

Nevndin hevur samtykt, at føroyska laksaveiðan skal vera eftir eini skipan, sum ásetur reglur um minstamát, tal av veiðiloyvum, veiðitíð og veiðidagar, avmarkar veiðutrýstið í einum

royndartíðarskeiði uppá 1 ár. Skipanin í føroyskari umseting er løgd hjá. (skjal 1).

Skipanin er í høvuðsheitum hin sama sum fyri árini frammanundan galdandi fyri eitt ár. Kvotan er óbroytt fyri eitt ár. Talið av veiðiloyvum skal ikki fara uppum 13 laksabátar broytt frá 15 í fjør og talið av veiðidøgum verður verandi 1200. Teir 150 dagarnir skuiu liggja millum 1. januar og 1. apríl (15. apríl í fjør) og 1. november og 31. desember.

SKJAL 1.

(Samtykt í NASCO)
Umseting úr enskum.

Nevndin fyri landnyrðingspartin av Atlantshavi.

Nevndin fyri landnyrðingspartin av Atlantshavi hjá Laksakonventiónini í Norðuratlantshavi ásetir, við atliti til grein 8. stk. b og við viðurkenning fyri tørvinum at ásetta reguleringar fyri føroyskum fiskiskapi í 1994, hesar reglur:

Føroysk veiða verður eftir einari skipan fyri avmarking í veiðitrýsti, sett út í undirskjali 1, galdandi í eitt ár.

Heildarveiðan fyri heita tíðarskeið skal ikki fara upp um 550 tons.

Undirskjal 1.

Hesar reglur fyri fiskiskapinum eftir laksi á føroyskum fiskiøki skulu galda fyri árið 1994:

1) Leiðir við laksi undir 60 cm verða stongdar sambært vanligu reglunum fyri at steingja leiðir við fiski undir mát. sum galda í føroyskum sjógvi.

2) Talið av fiskiførum, sum fáa laksaloyvi, skal ikki fara upp um 15.

3) Veiðitíðin er avmarkað til 150 dagar millum 1. januar og 1. apríl og 1. november og 31. desember.

4) Undir ásetingini um heildarveiði, skal mest loyvda fiskidagatalið fyri laksafiskiskapin á føroyskum fiskiøki, ikki fara upp um 1200 dagar.

1. viðgerð 21. januar 1994. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 17. februar 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 28. desember 1993 og eftir 1. viðgerð 21. januar 1994 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og er nevndin samd um at mæla løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 22. februar 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

72 Broyting í løgtingslóg um keyp av helikoptara

Ár 1993, týsdagin 28. desember legði Signar á Brúnni, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um keyp av helikoptara

.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 36 frá 14. apríl 1983 um keyp av helikoptara verður § 2 avtikin.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om køb af helikopter.

§ 1.

I lagtingslov nr. 36 af 14. april 1983 om køb af helikopter ophæves § 2.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

§ 2 í løgtingslóg um keyp av helikoptara ásetir, at Strandferðslan hevur raksturin av helikoptaranum um hendi.

Landsstýrið hevur frá Atlantsflog móttikið tilboð uppá at standa fyri rakstrinum av tyrlutænastuni fyri 4 mió. kr. um árið, og er hetta 1 mió. kr. minni enn tað, sum Strandferðslan roknar við, at tyrlutænastan fer at kosta í 1994 við verandi skipan.

Landsstýrið er av teirri áskoðan, at tað rakstrarliga sæð er ein fyrimunur, at flogferðslan er savnað á einum staði, og er tað tí í viðmerkingunum til grein 13251 "Tyrlutænastan" í

fíggjarlógaruppskotinum fyri 1994 tilskilað, at "ætlanin er at lata Atlantsflog standa fyri tyrlutænastuni í framtíðini".

Vísandi til omanfyri standandi og sum heild til tað óhepna í, at landsstýrið ikki sjálvt kann gera av, hvussu raksturin av tyrluni hjá landinum skal skipast, verður skotið upp, at ásetingin um hetta í lógini verður avtikin.

1. viðgerð 18. januar 1994. Málið varð beint í samferðslunevndina, sum 22. februar 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 28. desember 1993 og eftir 1. viðgerð 18. januar 1994 beint í samferðslunevndina.

Samferðslunevndin hevur viðgjørt málið, ið snýr seg um, at § 2 í løgtingslóg nr. 36 frá 14. apríl 1983 um keyp av helikoptara verður avtikin.

Orsøkin til hetta er, at landsstýrið hevur frá Atlantsflog móttikið tilboð uppá at standa fyri rakstrinum av tyrlutænastuni fyri 4 mió. kr. um árið, og er hetta 1 mió. kr. minni enn tað, sum samferðslan roknar við, at tyrlutænastan fer at kosta í 1994 við verandi skipan.

Mett verður, at tað rakstrarliga sæð er ein fyrimunur, at flogferðslan er savnað á einum staði, og er tað tí í viðmerkingunum til § 13/13251 "Tyrlutænastan" í fíggjarlógaruppskotinum fyri 1994 tilskilað, at "ætlanin er at lata Atlantsflog standa fyri tyrlutænastuni í framtíðini".

Landsstýrið metir seg ikki hava heimild til at fremja hesa broyting, uttan so, at ásetingin um hetta í § 2 í lógini verður avtikin.

Samferðslunevndin hevur viðgjørt tyrluflúgvingina í síni heild, og hevur í hesum sambandi havt fund við umboð fyri Tyrludeildina og Strandfaraskip Landsins.

Eisini hava umboð fyri Atlantsflog verið á fundi umframt landsstýrismannin í samferðslumálum, Signar á Brúnni.

Undir viðgerðini kom fram, at tyrlan flýgur uml. 355 tímar árliga í sambandi við verandi ferðaætlan, og at samlaða tímatalið, tá leigutúrar eru roknaðir uppí, er upp á uml. 500 tímar.

Umboð fyri Atlantsflog søgdu frá, at teir í teirra útrokningum fyri 1994 høvdu roknað við 400 tímum í sambandi við ferðaætlanina, og er hetta um 50 tímar meiri enn roknað er við í sambandi við verandi ferðaætlanina og sama kostnaðarstøði.

Undir viðgerðini hevur nevndin staðfest, at tilboðið hjá Atlantsflog fer at røkja tyrluflúgvingina á sama støði sum frammanundan, og nevndin setir tað sum sína treyt, at ferðaætlanin til útnyggjarnar og Gásadals ikki verður lækkað, og um broytingar henda, fer sáttmálin við Atlantsflog úr gildi straks.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Vísandi til upplýsingarnar og viðmerkingarnar frammanfyri, tekur **ein meiriluti** (Lasse Klein, Jógvan A. Johannessen, Heini Johansen og Hans Tausen Olsen) undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Minnilutin (Svend Aage Ellefsen og John Petersen) tekur **ikki** undir við uppskoti landsstýrisins, men vísir á, at fleiri orsøkir vóru til, at tað í 1983 við lóg varð avgjørt at leggja tyrluflúgvingina undir Strandferðsluna.

Eitt nú fyrisat Strandferðslan frammanundan alt annað alment flutningssamband bygdanna millum, og tyrlutænastan gjørdist soleiðis ein integreraður partur av tænastuveitingum Strandferðslunnar. Var talan um sama stovn, kundi peningajáttan til tyrlutænastuna síðustillast við samferðslujáttanir til støðru plássini, og meu varð, at hetta kom at verða smábygdunum til fyrimunar í fíggjarliga trongum tíðum.

Als eingir møguleikar vóru (ella eru) fyri, at tyrluflúgving til útoyggjarnar kom at gerast lønandi vinna. Tænastan má, so leingi hon verður tøk, í mesta mun tíggjast við peningi úr landskassanum.

Minnilutin metir, at skipanin, sum hon hevur verið, hevur verið smáplássunum til sera stórt gagn, og minnilutin er ikki sinnaður at taka undir við nýggjari skipan, har játtanarmyndugleikin kemur at seta peningaliga tørvin hjá føroyska flogfelagnum upp móti lívsneyðugari tænastuveiting til útoyggjarnar. Undir nevndarviðgerðini er komið fram, at Strandferðslan og Atlantsflog hvørt í sínum lagi meta seg kunna reka tyrlutænastuna ódýrast.

Eftir nevndarviðgerðina er niðurstøðan hjá minnilutanum, at rakstur av einari tyrlu og einum fastveingjaðum flogfari innan sama flogfelag samanumtikið ikki verður til fyrimunar, og at ongar skynsemisbroytingar fáast burturúr.

Annars inniber avtalan, ið ætlað er at gera millum flogfelagið og landsstýrið bert fastan prís fyri 1994, meðan samráðast skal av nýggjum um prísin av tyrlurakstrinum ár fyri ár.

Minnilutin vísir í hesum sambandi á, at smáplássini lættliga verða giðslar, tá peningur skal nýjáttast, um tænastan dýrkar.

Verður tyrluraksturin lagdur undir flogfelagið, kan henda, at ávísar uppgávur bert verða gjørdar móti eykarokning.

Sum dømi kunnu nevnast:

a) Eykatúrar í sambandi við, at avlýsingar hava verið, og ferðafólk og farmur tí eru niðanfyri, og
b) eykatúrar við olju, fóðri, slakti og tílíkum upp undir høgtíðir og ávísar árstíðir til smáoyggjar, ið ikki hava samband sjóvegis, og tí ikki kunnu vera hesar eykatúrarnar fyriuttan. Smáplássini kunnu als ikki liva við, at teimum verður noktað slík tænasta!

Víst kann eisini verða á, at løgtingið hevur fingið mótmælisskriv bæði úr Skúvoy, Fugloy og Mykinesi, og mæla fólk á hesum plássum staðiliga frá umskipanini.

Fært varð fram undir fyrstu viðgerð, at tyrluraksturin kundi gerast munagott ískoyti hjá

Atlantic Airways, men sambært upplýsingum frá felagnum í samferðslunevndini, er at kalla eingin inntøka innroknað í tilboðið, sum felagið hevði givið landsstýrinum. Rakstrarliga hevur umskipanin sostatt ikki týdning fyri flogfelagið. Treyðugt skuldi flogfelagið komið í ta støðu, at tað misti pening uppá tyrlurakstur til smáoyggjarnar!

Í staðin fyri at leggja Atlantic Airways tyrluflúgvingina til byrðu, eigur landsstýrið at gera munagóð framtriv til at bøta um soliditetsstøðuna og lønsemið hjá felagnum, og mælir minnilutin tí landsstýrinum til:

1) At økja partapeningin í Atlantic Airways, so skuldarbyrðan lætnar, og gjaldførið gerst betur.

2) At geva Atlantic Airways størri samsýning fyri teknisku umsitingini av tyrluni, sum flogfelagið røkir.

3) Alt í einum at stovnseta "taxfree-sølu" á flogvøllinum og lata Atlantic Airways hesa søluna upp í hendi.

Tá landsstýrið ikki er sinnað at lata Statens Luftfartsvæsen byggja upp í farstøðina, eigur at verða makaskift um gólvvídd hjá landsstovnunum (Strandferðsluni og Toll- og Skattstovuni) og dønum, so pláss kortini verður fyri handilshølum á støðini.

Taxfree-sølan skuldi verið opin bæði fyri farandi og komandi ferðafólkum.

Tað líkist púrt ongum, at landsstýrið ikki er meira íðið at útvega okkum tað virksemið og ta inntøkuna, sum hevði staðist av, at ferðafólk heldur keyptu inn í Vágum enn í Kastrup ávikavist Reykjavík.

Ein annar minniluti (Terje Davidsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

2. viðgerð 25. februar 1994. Samtykt at beina uppskotið til 3. viðgerð við 17-0 atkvøðum.

3. viðgerð 28. februar 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

Lóg nr. 36 frá 24. mars 1994.

FL jnr. 1813-2/90.

73 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum v.m.

Ár 1994, týsdagin 25. januar legði John Petersen, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 175 frá 18. december 1992 um skrásetingargjald á motorakførum v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, stk. 1 ganga út orðini "og eitt vektgjald".
2) § 2, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"MVG-/virðisgrundarlagið á motorakførum er søluprísur frá seljara í Føroyum til keypara, íroknað, at akfarið er útgjørt við allari vanligari útgerð og eykútgerð. Í mvg-/virðisgrundarlagið inngongur fakturaprísur, farmagjald, flutningstrygging, vørugjald, uppskipan og klárgerð, vinningur sambært § 1, skrásetingarsýn, tollur o.t. í Føroyum. Í skrásetingargjaldi verða goldin 30% av mvg-/virðisgrundarlagnum.
3) Í § 2, stk. 2, stk. 4 og stk. 5 verður "virðisgrundarlagið" broytt til "mvg-/virðisgrundarlagið".
4) § 2, stk. 3 gongur út, og stk. 4 og 5 verða stk. 3 og 4.
5) § 3 verður orðað soleiðis:
"Persónsvognar: Virðisgjald: 30%".
6) § 5 verður orðað soleiðis:
"Vøruvognar av skapi og merki sum persónsvognar: Virðisgjald: 10%."
7) Í § 5 verður 2. stk. soljóðandi:
"Verður vøruvognur umskrásettur til persónsvogn, skal munurin á

lagtingslov om ændring af registreringsafgift af motorkøretøjer m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 175 af 18. december 1992 om registreringsafgift af motorkøretøjer m.v. foretages følgende ændringer:

1) I § 1, stk. 1 ændres ordene "værdi- og en vægtafgift" til: "værdiafgift".
2) § 2, stk. 1 affattes således:
"MVG-/Værdigrundlaget for motorkøretøjer er salgsprisen fra sælger på Færøerne til køber, iberegnet at køretøjet er forsynet med standardudstyr og ekstraudstyr. I mvg-/værdigrundlaget indgår fakturapris, fragtafgift, transportforsikring, vareafgift, losning og klargørelse, avance, registreringsafgift jfr. § 1, registreringsgebyr, told o.l. på Færøerne. Som registreringsgebyr erlægges 30% af mvg-/værdigrundlaget.
3) I § 2, stk. 2, stk. 4 og 5 ændres "værdigrundlaget" til "mvg-/grundlaget".
4) § 2, stk. 3 udgår, og stk. 4 og 5 bliver stk. 3 og 4.
5) § 3 affattes således: "Personmotorkøretøjer. Værdiafgift: 30%
6) § 5 affattes således: "Varevogne af type og fabrikat som personvogne. Værdiafgift: 10%."
7) Stk. 2 i § 5 affattes således:
"Såfremt en varevogn omregistreres til en personvogn, skal differencen

virðisgjaldinum rindast landskassanum."

8) § 6 verður orðað soleiðis:
"Bussar til 10 persónar ella fleiri, førarin íroknaður:
Virðisgjald: Einki gjald Vektgjald: Einki gjald."

9) § 8 verður orðað soleiðis:
"Last- og vøruvognar, dumparar og leguvognar, stødd eftir totalvekt:
Virðisgjald 10%
Vektgjald: Einki gjald."

10) § 11 verður orðað soleiðis:
"Motorsúkklur.
Virðisgjald 30%
Vektgjald: Einki gjald."

11) § 12 verður orðað soleiðis:
"Campingvognar.
Virðisgjald 30%
Vektgjald: Einki gjald.

12) § 14 verður orðað soleiðis:
"Aðrir viðfestivognar.
Virðisgjald: Einki gjald.
Vektgjald: Einki gjald.

13) § 18, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"Skrásetingargjaldið kann tó ongantíð verða lægri enn 40% av virðisgjaldinum fyri sama akfar sum nýtt."

betales til landskassen."

8) § 6 affattes således: "Busser til 10 personer og derover, føreren iberegnet:
Værdiafgift: Ingen afgift.
Vægtafgift: Ingen afgift."

9) § 8 affattes således: "Last- og varevogne, dumpers og sættevogne, størrelse efter totalvægt: Værdiafgift: 10%
Vægtafgift: Ingen afgift."

10) § 11 affattes således: "Motorcykler.
Værdiafgift: 30%
Vægtafgift: Ingen afgift."

11) § 12 affattes således: "Campingvogne.
Værdiafgift: 30%
Vægtafgift: Ingen afgift."

12) § 14 affattes således: "Andre påhængsvogne.
Værdiafgift: 46%
Vægtafgift: Ingen afgift."

13) § 18, stk. 3 affattes således:
Registreringsafgiften kan dog aldrig være lavere end vægtafgiften i henhold til § 3, 40% af værdiafgiften for tilsvarende køretøj som nyt."

Viðmerkingar

Uppskotið er ein ávegis partsroynd at gera øll akfør bíligari, so

1. Meinigi føroyingurin fær betri ráð at skifta sín gamla bil út.
2. Vinnuvirki fáa møguleika at útvega hóskandi arbeiðsakfar.
3. Nakrir av teim 100-tals handverkarum, sum hava mist sítt arbeiði, aftur sleppa í vinnu.
4. Landskassin kann fáa størri inntøkur frá hesi fyrr so tryggu inntøkukeldu.

Bilavinnan er nevniliga ein av teim mongu vinnugreinum, sum er køvd av almenna skatta- og tollágangnum farnu mongu árini til at nøkta almenna nýtslutørvin.

Verður uppskotið samtykt, lækkar søluprísurin á øllum akførum millum fjórðing og triðing av núverandi bilaprísum. Sostatt fellur ein nú "bíligur" bilur úr t.d. 130.000 kr. niður í 95.000 kr. Ein miðal dýrur bilur fellur úr t.d. 170.000 kr. niður í 125.000 kr. Ein í dag dýrur bilur fellur úr t.d. 300.000 kr. niur í góðar 200.000 kr. o.s.fr.

Sama verður galdandi fyri vøruvognar, lastbilar, motorsúkklur og knallertir, um løgtingið samtykkir uppskotið til lóg. Øll akfør verða bíligari.

Men uppskotið hevur eisini við sær, at landskassans inntøka hækkar í sama mun, sum talið á innfluttum, seldum og umvældum bilum økist.

Uppskotna prislækkingin á øllum akførum, tað økta virksemið í bilavinnuni og tann hækkaða landskassainntøkan fæst við at gera biltollingina einfaldari og lagaligari. Sum er kostar ein bilur frá bilhandli í Føroyum millum 3 og 4 ferðir tann prís, sum verksmiðjan selir hilin fyri. Eftir uppskotinum lækkar útsøluprísurin niður í gott tvær ferðir innkeypsprísin.

Biligari arbeiðsbilar høvdu strimbrað okkara hart kroystu vinnufyritøkur almikið.

Ein lækking av bilaprísinum er bráneyðug sum ein roynd at tálma vøksturin í arbeiðsloysinum og flytingini úr Føroyum. Fyri bert 3-4 árum síðan fingu 4-500 fólk, serliga handverkarar, sína útrøku í bilavinnuni. Bilavinnan liggur á odda í mekaniskari tøknifrøði, og tí er tað av alstórum týdningi, at Føroyar ikki missa tann lívsneyðuga fyrimun, tað er hjá einum og hvørjum samfelag, at hava eitt fjølment og væl útbúgvið lið av mekanikarum.

Kreppan í samfelagnum, sum fyrst og fremst stavar frá almennu eyðræningini av landsins íbúgvum og vinnulívi við skatti og tolli, hevur ført við sær, at eingin longur hevur ráð til at keypa bil, hvørki nýggjan ella brúktan. Tískil er talið á starvsfólki í bilavinnuni fallið úr 400-500 niður um 100, t.e. 80% síðan 1989.

Persónbilurin (ella "privatbilisman") er ein av nógvum stórsigrum demokratisku kapitalismunnar í striðnum móti hópfátækradømi mannaættarinnar hesa farnu øldina. Bilurin var óuppnáiligt marglæti fyri meiniga mannin fyri bert fáum ættarliðum síðan. Men kapitalistiska menningin setti bilin í túnið hjá nærum hvørjum húski í okkara tíð.

Men frælsi hins einstaka til at ráða sær sjálvum í tíð og stað, til at flyta seg við egnum akfari eftir vild, til at bróta stavnsband støðusamfelagsins, hetta frælsið, sum bilurin gav okkum øllum, hevur vissuliga møtt stórari politiskari mótstøðu. Ideologiskt snævurskygni trýsti kollektivan fólkaflutning inn á føroyska samfelagið í nógv støtri mun, enn eftirspurningur var eftir. Sostatt hevur t.d. Bygdaleiðir farnu 10 árini kostað skattgjaldarunum 300 mió. kr. í rakstrarhalli - t.e. 25.000 kr. upp á húskið - umframt kostnað av ferðaseðlum. (Ikki fyrrenn í 1991 byrjaði hetta hall at minka.)

Eisini hava politikarar lagt toll omanr á avgjald, eykaavgjald, vektgjald, virðisgjald, MVG o.s.fr. á sjálvan bilaprísin. Tískil fæst ein bilur, ið kostar t.d. 50.000 kr. frá verksmiðju, ikki fyri minni enn 170.000 kr. frá føroyskum bilhandli. Altso tekur hitt almenna sær yvir 100.000 kr. ella 2/3 av útsøluprísinum.

Í ómettandi tráan eftir peningi til at nøkta ósløkkjandi tosta hins almenna eftir støðugt meir peningi hava politikarar pínt bilaprísirnar upp eftir í mong ár. Øvundin hevur verið brúkt til undanførslu, so teir dýru bilarnir dýrkaðu mest. So sluppu tey "ríku" at rinda mest fyri sítt bilaval. Úrslitið av hesum øvundarpolitikki er nú, at allir bilprísir hækkaðu upp hagar, at neyvan nakar, og tá als ikki fjøldin, hevur ráð til at keypa bil.

So leingi búskaparliga uppdriftin vardi, fingu fólk fígging til bilkeyp. Bilaparkin í Føroyum øktist soleiðis:

1970	3.639
1975	7.430
1980	11.912
1985	15.730
1988	18.895
1993	15.950

Sum sæst, toppar bilatalið í 1988. Síðan er tað fallið meir enn 2.000 akfør. Stórni goymslurnar av brúktum bilum í bilahandlunum eru minkaðar burtur í einki. Sostatt eru fleiri túsund bilar færri í landinum í dag enn fyri 4 árum síðan.

Árliga talið á innfluttum bilum sýnir eisini stóran keypshug og --orku í 80-árunum. Sum dømi kunnu nevnast, at í

1980 vórðu	1.259	nýggj akfør	skráset	
1987 "	2.710	"	"	"
1990 "	531	"	"	"
1992 "	557	"	"	"
1993 "	133	"	"	"

Frá 1985-88 lá miðaltalið um 2.000 innfluttar bilar árliga. Tað toppar í 1987. Sostatt varð bilaparkin so gott sum útskift eftir fáum árum. Tann bilakeypshugurin var í meira lagi. Men kollapsið í bilainnflutningin eftir 1990 er alt ov stór afturgongd. Tí bilaparkin er nú nógv eldri í miðal enn fyri 5 árum síðan. Tað merkir aftur, at trygdin fer at halta, so hvørt sum miðalaldurin á føroysku bilunum hækkar.

Handilstølini fyri innflutningin vísa, at bilarnir sum vørubólkur kostaðu so nógv:

1985	125	mió. kr.
1986	189	" "
1987	212	" "
1988	156	" "
1989	103	" "
1990	33	" "
1991	35	" "
1992	37	" "
1993	9	" "

Lutvíst fyri at tálma bilainnflutninginum, lutvíst fyri at brennsa fólkaynskinum at koyra í góðum bili, men serliga fyri at vinna landskassanum meir pening í ósløkkjandi tostanum eftir størri almennari nýtslu, hækkaðu politikarar ferð eftir ferð toll og alskyns avgjøld á bilum. Uppfinnsemið í jagstranini eftir biltolli og bilavgjøldum kendi einki mark. Lógin um tolling av motorakførum er ein frumskógur av krøvum um fløktar útrokningar. (Sí viðløgdu skjøl sum dømi). Hetta uppskot sum lóg hevði gjørt útrokningina einfaldari.

Stóri vøksturin í bilatalinum seinna part av 80-árunum gav gylt í landskassan. Landskassans inntøku frá bilainnflutninginum vóru hesi:

Ár	Skráset gjøld
1987	160 mió. kr.
1988	120 " "
1989	81 " "
1990	31 " "
1991	34 " "
1992	29 " "
1993	10 " "

Harumframt hevur vegskatturin givið hinum almenna um 30-35 mió. kr. árliga í nógv ár. Føroyar hava hægsta bensinpris í Europa, so eisini har hevur hitt almenna havt sína køvandi hond við í spælinum og fingið um 40 mió. kr. árliga í inntøku.

Í 1988, 89 og 90 væntaði landsstýrið sær ávikavist 40, 38 og 53 mió. kr. meiri í skráseting-argjaldi, enn tað veruliga eydnaðist at láa í landskassan, tí bilainnflutningurin fall burtur at kalla. Hetta veruleikafjarа bjartskygni sýnir best, at politikararnir væntaðu sær fleiri gullegg frá hesi "hønuni", eftir at teir høvdu keypt hana við tolli og avgjøldum.

Men sjálvt tann sannroynd, at eisini henda áður so veilandi keldan til almennar inniøgur nú var tornað, hevur ikki enn fingið landsstýrið til at taka náttúrligu fylgjurnar av hesi dáragerð at tolla bilhandilin til deyðis og at lækka toll- og avgjøldini.

Heldur ikki tann mista inntøkan í skatti og øðrum nýtsluavgjøldum frá teimum hundraðtals handverkarum í bilavinnuni, sum nú eru arbeiðsleysir ella arbeiða svart hevur fingið landsstýrið at lækka biltollin soleiðis, at vinnan kemur fyri seg aftur og verður grundarlag undir 100-tals arbeiðsplássum.

1.000 nýggir bilar seldir árliga høvdu við lækkaðum toll- og avgjøldum smbr. hesum uppskoti givið landskassanum um 60 mió. kr. í inntøku. Orsakað av høpisleyst høgum tolli- o.ø. skrásetingargjøldum fær landskassin nú millum lítið og einki í inntøku frá hesum vørubólki, tí einki verður innflutt.

400 handverkarar, sveinar, lærlingar og sølufólk fingu helst 150.000 kr. í ársinntøku í miðal og høvdu goldið 40 mió. kr. í skatti og nýtslutolli. Í staðin rindar AL.S hesum 400 arbeiðsleysu bilafólkum 20 mió. kr. fyri einki at gera ella arbeiða svart. Havast má í huga, at bilavinnan var ein hin fremsta til at geva handliga hugaðum ungdómum møguleika fyri læruplássi. Hesi ungu ganga nú arbeiðsleys ella rýma av landinum.

Sostatt missir hitt almenna um 120 mió. kr. árliga, mest tí politikarar ikki skilja týdningin av, at jú harðari ein vøra, tænasta ella arbeiði verða revsað við beinleiðis og óbeinleiðis skatti, jú minni fær hitt almenna í kassan. Allur búskapurin sviður fyri tað. Núverandi støða er høpisleys við so stórum avgjøldum á bilum, at bilasølan er steðgað, arbeiðsloysið millum bilmekanikarar og sølufólk er ógvusligt, og landskassin fær einki í inntøku.

Uppskotsstillarin mælir tinginum til at taka undir við hesum lógaruppskotinum um at gera øll akfør bíligari, at skapa fleiri arbeiðspláss í handverksvinnuni, at linna kreppuna í búskapinum og at bøta støðuna í samfelagnum, harvið eisini í landskassanum.

1. viðgerð 2. februar 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 26. apríl 1994 legði fram soljóðandi

F e l a g s á l i t

í

løgtingsmáli nr. 73/1993: Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum v.m., nr. 119/1993: Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum v.m., og nr. 160/1993: Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum.

Løgtingsmálini nr. 73 og nr. 119 eru løgd fram av fólkaflokkinum ávikavist 26. januar og 17. februar 1994 og eru bæði eftir 1. viðgerð ávikavist 2. februar og 22. februar 1994 beind í skattanevndina. Løgtingsmál nr. 160 er lagt fram av landsstýrinum 18. mars og eftir 1. viðgerð 22. mars 1994 beint í skattanevndina.

Løgtingsmál nr. 73 er ein roynd at minka avgjøldini á bilum í ásannanini av, at bilavinnan er í svárari kreppu, meðan løgtingsmál nr. 119 hevur til endamáls at minka avgjøldini á trygdarfremjandi útgerð. Broytingin í sambandi við løgtingsmál nr. 160 snýr seg um at gera broyting í lógini, so at landsstýrið fær møguleika í kunngerð nágreinliga at lýsa m.a., nær akfar er so mikið lítið broytt í sambandi við umbygging av akførum, at talan kann sigast at vera um sama akfar, sum frammanundan umbyggingini.

Nevndin hevur viðgjørt málini á fundi og er samd um at seta fram uppskot til samtyktar í staðin fyri uppskotini um lógarbroytingar so, at landsstýrið kann gera sínar viðmerkingar.

Í sambandi við viðgerðina hevur nevndin havt fund við Finnboga Ísakson, landsstýrismann, umboð fyri Toll- og Skattstovu Føroya og umboð fyri bilhandlarar og Verkstaðseigarar, og somuleiðis hevur nevndin fingið brævi frá teimum.

Landsstýrismaðurin segði, at landsstýrið arbeiðir við fleiri av broytingunum, sum eru skotnar upp í løgtingsmálunum nr. 73 og 119 og segði, at landsstýrið er sinnað at koma við broytingum longu seinast í mai 1994, tá ætlanin er, at tingið skal viðgera onnur mál, men metti tað vera rætt, at landsstýrið fær møguleikar at koma við viðmerkingunum og útrokningum, áðrenn eitt tílíkt uppskot verður samtykt.

Nevndin er samd um at geva landsstýrinum hesa møguleika og setir fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri løgtingið í mai 1994 uppskot um løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum v.m.

Ein samd skattanevnd mælir annars tinginum til at samtykkja løgtingsmál nr. 160.

Jógvan Sundstein tekur í fyrsta lagi undir við tingmálunum nr. 73/1993 og 119/1993 og í øðrum lagi undir við eini samdari nevnd.

2. viðgerð 27. apríl 1994. Uppskotið fall við 8-0 atkvøðum. Uppskotið frá samdari nevnd samtykt við 27-0 atkvøðum.

74 Upploysing av Fíggingargrunninum frá 1992 og uppsøgn av Richard Mikkelsen

Ár 1994, týsdagin 1. februar legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

1. **Løgtingið samtykkir, at Fíggingargrunnurin frá 1992 verður upploystur.**

2. **Løgtingið áleggur landsstýrinum í stundini at krevja av ríkisstjórnini, at Fíggingargrunnurin frá 1992 fær føroyskan meiriluta, og at Richard Mikkelsen verður settur úr nevndini.**

Viðmerkingar

Upprunaliga var Fíggingargrunnurin frá 1992 ætlaður sum ein fyribils umsitingarnevnd av tí 500 mió. kr. láni, løgtingið tók í oktober 92 til tess at tryggja framhaldandi rakstri Sjóvinnubankans. (Longu tá ávaraði undirritaði móti, at lánstreytirnar fóru at seta ta fyrstu av fleiri skriðum á lop, og at hesar áhaldandi skriður fóru at gerast Føroyum óbotaligur skaði.)

Men síðan er nevndin í Fíggingargrunninum verðin ein "junta" við danskari leiðslu, sum stýrir føroyska búskapinum út í æsir. Meirilutin er danskur og hevur tikið sær imperialistiskt vald, meðan føroyski minnilutin situr ómælandi uttan ávirkan. Hetta sosialistiska landsstýrið hevur verið sera undirbrotligt fyri donskum krøvum til at bróta niður føroyska búskapin og harvið samfelagið.

Danska leiðslan í Fíggingargrunninum hevur ikki hóming av, og enn minni virðing fyri, teim

búskaparligu fortreytum, sum hava verið og eru galdandi fyri okkara samfelag. Jú fleiri búskaparligar reglur í Føroyum verða gjørdar eftir danskari fyrimynd, jú verri verður standurin. Henda sannroynd hevur verið grundstøðið undir sjálvbjargnisstrevi føroyinga í øldir.

Nú hovur so leiðslan í Fíggingargrunninum frá 92 sloppið at hóreiggja sær við Føroya landi og fólki í hálvtannað ár. Hon hevur ikki staðið sína roynd, men eftir stutta tíð legsað bankaskipan, peningakervi og høvuðsvinnu okkara niður.

Úrslitið av hesi óátalaðu valdsnýtslu móti Føroyum er, at búskapurin er niðursjóðaður til bert uml. 2/3 av tí, hann var, tá fyrsta 500 mió. lánið varð tikið fyri 16 mánaðum síðan.

Veruligi valdsharrin í Føroyum er Richard Mikkelsen, formaður í Fíggingargrunninum. Vit vita nú av ringum royndum, at hann er fullkomiliga óskikkaður til hesa álvarsligu uppgávu. Men eisini nærkast hann 75 ára aldri, tá øll onnur við lóg langt síðan skulu vera farin úr almennum starvi fyri atdur.

Tí er lívsneyðugt:

1) at Fíggingargrunnurin fær føroyskan meirituta av kvalitíseraðum fólki, hvørs einasta bundna uppgáva verður at upploysa Fíggingargrunnin frá 1992, og

2) at Richard Mikkelsen verður vístur úr Føroyum fyri landsskaðiligt virksemi.

1. viðgerð 17. februar 1994. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Óla Breckmann, løgtingsmanni, tann 1. februar 1994 og eftir 1. viðgerð 17. februar 1994 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og vil nýta høvi til at vísa á, at løgtingsmál nr. 74/1993 ikki átti at verið viðgjørt í løgtinginum, soleiðis sum tað er orðað.

Sama, hvat løgtingið metir um leiklut Fíggingargrunsins frá 1992 og nevndarformann hansara, Richard Mikkelsen, sømir tað seg ikki, at løgtingið á henda hátt viðger einstakan persón clla samtykkir at seta úr starvi nevndarformann, ið er settur av donsku ríkisstjórnini eftir avtalu við landsstýrið og løgtingið, millum teirra eisini uppskotsstillaran. Eitt annað er, at løgtingið sjálvsagt kan viðgera spurningar viðvíkjandi Fíggingargrunninum frá 1992 og framtíð hansara í Føroyum, tá ið tingið metir, at tørvur er á tí. Rættarnevndin tekur sambært hesum viðmerkingum ikki undir við uppskotinum til samtyktar.

2. viðgerð 22. apríl 1994. Uppskotini 1 og 2 fullu við ávikavist 2-0 og 3-0 atkvøðum.

75 Skuldaravskriving av sethúsum í bankunum, sølu av partapeningínum í føroysku bankunum og fyribyrging av monopolbanka

Ár 1994, týsdagin 18. januar legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

I U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum sum nógv størsta partaeigara og tískil luttum avgerðarrætti í føroysku bankunum fylgjandi:

Sum mest av bankanna avsettu peningaupphæddunum móti tapum, í minsta lagi 1.300 mió. kr. verða í stundini avskrivaðar upp á føroysk sethús, so skuldaravskrivingin kemur føroyskum sethúsaeigarum kontant tilgóða. Skuldarsaneringin fer fram eftir einsháttaðum og objektivum reglum, so húsalánini minka við t.d. fjórðingi, triðingi, helvt, ella so langt burturleggingarnar røkka.

Viðmerkingar til samtykt 1 (skuldarsanering):

Uppskotið er ætlað at noyða bankarnar eftir løgtingssamtykt at skuldarsanera føroysku sethúsalánini, so minst 1,3 mia. kr. av burturleggingum bankanna, júst lænt og avsett til hetta endamál, kemur sethúsaeigarum kontant tilgóða í avskrivaðari sethúsaskuld.

Landskassin hevur lænt 3.150 mió. kr. tilsamans síðani okt. 92, mest til Føroya Banka og Sjóvinnubankan til burturlegging móti væntaðum og avskriving av ásannaðum tapum. Føroyski skattgjaldarin heftir fyri hesa lánsskuld úteftir og má rinda hana aftur yvir skatt og toll komandi mongu árini.

Harumframt hava bankarnir sjálvir avsett móti tapum uml. 2 mia. kr. av sínum egnu brutto rakstraravlopum árini fram til og við 92.

Sostatt skuldu bankarnir tilsamans havt avskrivað og avsett um 4,2 mia. kr. tilsamans.

Nakað væl av hesum peningi er longu mistur, bókaður burtur móti konstateraðum tapum, serliga nú fiskivinnan á sjógvi og landi fór undir beinkin lutvíst av fiskaloysi og prísfalli á fiski, lutvíst tí løgtingið strikaði uml. 300 mió. kr. í árligari afturbering um tíggjarlógina til fiskivinnuna. Harvið misti høvuðsvinnan eina inntøku, sum forrentaði um 1,5 mia. kr. í samlaðum íløgum. Men landsstýrið sló samstundis hotnin úr landskassanum, tí 100-tals mió. kr. máttu leggjast út í veðhaldum. Alt annað virksemi, m.a. handils- og handverksvinnan fylgdi við á ørmundarhús. Kostnaðarstøðið hevur verið hildið kunstiga uppi av alt ov høgum skattatrýsti og hevur gjørt, at einki vinnuligt virksemi loysir seg. Arbeiðsloysið vaks, inntøkur fullu og nú tí endans sansaði at hjá nærum øllum sethúsaeigarum.

Seinasta statslánið upp á 1,3 mia. kr. mátti landskassin taka og lata bankunum megin partin av, tí Figgjareftirlitið hevði skrivað húsavirðini heilt niður móti miðal 7, veðrætti kring landið.

Bankarnir hava fingið tilført øll hesi lán, harav nakað longu er avskrivað. Men enn eiga teir um 1,7 mió. kr. avsett í part, nú svarandi til upp móti helmingi av teim uml. 3,5 mia. kr. hvør teirra nú hevur sum útlánsmassa. Hetta er óvanliga gott stovnsfesti hjá peningastovnum eftir altjóða máti.

Men samstundis er alt íløgu- og útlánsvirksemi steðgað, tí bankarnir eru nú, eftir nýggja óføroyska arbeiðsháttí sínum, vorðnir ein snávingarsteinur í vinnuligu endurmenningini, ja eru ein deyðvekt í búskapinum. Tann óvanliga góði likviditeturin í bankunum í løtuni tænir ongum endamáli annað enn at darva ølhum framburði í landinum.

Herfyri lækkaðu peningastovnarnir rentustøðið, sum lættir um 160 mió. kr. í árligum rentugjaldi samanlagt í búskapinum. Men hetta lítla andarhaldið hjá húsaeigarum er bert úrslit av altjóða rentulækking. Sostatt liggja bankarnir enn á uml. 2 mia. kr. falt eftir at teir í mesta lagi hava avskrivað og mist 1,5 mia. kr. upp á fiskivinnuna og nakrar hundrað mió. kr. til handils- og handverksvinnuna.

Føroya fólk spyr tí, hví føroyski sethúsaeigarin, t.e. um 90% av íbúgvum landsins, bert skal standa sum skuldari og afturgjaldari av teim um 2 mia. kr., sum bankarnir hava avsett serliga móti væntaðum tapum upp á sethús, uttan at sethúsaeigarin fær nakran sum helst kontantan fyrimun av hesum almennu lánum til bankarnar.

Endamálið við hesum uppskoti til samtyktar er at áleggja bankunum við løgtingssamtykt at strika so stóran part av sethúsalánum føroyinga eftir einsháttaðum objektivum forskriftum, sum avsetti peningur bankanna til hetta endamál røkkur, t.e. fjórðing, triðing ella helvt av allari sethúsaskuld hjá hvørjum einstøkum eigara.

Men verður uppskotið felt, merkir tað, at meiriluti løgtingsins áleggur føroyingum at gjalda sína sethúsaskuld aftur tvær ferðir: Fyrst rinda fólk sum sethúsaeigarar húsalán sín til bankarnar. Men omaná rinda tey sum skattgjaldarar statslánini aftur sum uttanlandsskuld hjá landskassanum.

Umframt frammanfyri standandi skjýtur fólkaflokkurin upp, at løgtingið áleggur landsstýrinum fylgjandi:

II Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum, at

2. **Partapeningurin í føroysku bankunum verður seldur áhugaðum føroyskum keyparum í frium útboði so skjótt, sum skuldarsaneringin av sethúsunum fyri**

minst 1,3 mia. kr., er farin fram.

3. **Sjóvinnubankin og Føroya Banki verða verandi tveir serskildir peningastovnar og skipaðir sum vanlig partafeløg, hvørs uppgáva verður at reka alt vanligt bankavirksemi, hvør við sínum partapeningi, hvør sínum aðalfundi, sum velja hvør sína bankanevnd, sum síðan setir hvør sín(ar) stjóra(r).**

Viðmerkingar

Virksemi føroysku bankanna í 1980-árunum var ein spegilsmynd av tí, sum annars hendi í samfelagnum hetta tíðarskeið, privat, vinnuliga og politiskt. Mang:. ið einstaklingar, vinnuvirki, fakfeløg, almennir stovnar, kommunur, løgting, alt í samvinnu við danskar fíggingarstovnar, serlig kredittfeløg, men eisini rikisstjórn, gjørdu hetta ártíggju, var betur gjørt øðrvísi ella ógjørt.

Avleiðingarnar kenna vit: Uttanlandsskuldin øktist, serliga undir sosialistiska landsstýrinum 1985-88, úr 3 upp í 8 mia. kr. tilsamans. Kostnaðarstøði, skattatrýst, lønarlag, vinnulig tiltøk, almenn bólgnan og búskaparligur bygnaður, alt fór av lagi. Tá fiskaloysi og fiskaprísfall raktu í 1992, ruddi búskapargrundarlagið undan samfelagnum, sum varð kroyst undir almennu yvirvektini og tí alt ov høga kostnaðarstøðinum á høvuðsvinnu og annað vinnulív.

Ein tann mest skaðiliga avleiðingin av skrædlinum var, at búskaparliga valdið varð tikið frá fólkinum og lagt í hendumar á nøkrum donsku bankastjórum og embætismonnum. Bankarnir hava eftir oktober 92 verið so illa stýrdir eftir donskum mynstri, at teir hava skuldarbundið føroyska skattgjaldaran við 3.200 mió. kr.

Ferð eftir ferð hevur verið neyðugt at taka upp ruðuleikan við stórum lánum av tí bankapolitikki (við tigandi samtykt úr Tinganesi), sum danska "bankajuntan", ið nú ræður Føroyum (við undirbrotligari undirtøku í landsstýrinum) hevur ført.

Úrslitið av hesum kolluta bankapolitikki eftir oktober 1992 er, at búskapurin hímast, og fólkið alt er hótt av húsagangi. Tí er neyðugt at broyta hesa óndu ringrás. Tað gerst best við, at løgtingið samtykkir hesa samtykt, ið áleggur landsstýrinum at krevja av ríkisstjórnini, at tann nú alment átti partapeningurin, um stórthundrað mió. kr. í hvørjum banka, verður seldur áhugaðum føroyskum keyparum í frium útboði av hesum partabrøvum.

Uppskotið fordar, at báðir bankarnir verða lagdir saman í ein monopolbanka. Tí uttan kapping millum bankar er eingin vón um búskaparliga menning aftur.

So kunnu nýggju privatu eigararnir á aðalfundum velja nýggjar nevndir, sum síðan kunnu siga donsku bankastjórunum og nevndarlimunum upp. Flestir teirra eru settir av Den Danske Bank, hóast hesin skaðagripur er lopin frá sínum lyfti um at stuðla Føroya Banka og hevur sagt Føroyum farvæl (fyribils).

1. viðgerð 15. februar 1994. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 18. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 18. januar 1994 og eftir 1. viðgerð 15. februar 1994 beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen, Karl Heri Joensen og Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við málinum.

Minnihutin (Birgir Danielsen) ásannar, at ein av okkara størstu og enn óloystu trupulleikum er, at okkara unga fólk uttan skyld hevur fingið lán til sethús at dragast við, sum tey í alt ov nógvum førum ongan møguleika hava at renta og gjalda aftur.

Tvingsilssølur, arbeiðsloysi og flýggjan av landinum er tíverri dagligur kostur.

Um hetta ikki longu er vorðin ein galin endi, so verður tað heilt skjótt.

Tann politiski myndugleikin hevur skyldu til at laga viðurskiftini soleiðis, at tað unga fólkið hevur møguleika at støðast í landinum. Fyrsta treytin er samsvar millum inntøkumøguleikar og útreiðslur, herav útreiðslur til hús vanliga er tann størsta - umframt skattin. Hetta eru útreiðslur, sum vanligi borgarin einki kann gera við.

Minnilutin metir, at tað eru nógvir rættir tankar í uppskotinum, men at tað kann neyvan gerast til veruleika, sum tað nú er orðað. Umframt eru fleiri onnur uppskot, sum miða ímóti eini loysn av húsalánstrupulleikunum. Í hesum sambandi kann verða víst til:

Løgtingslóg nr. 158 og kunngerð nr. 159 um umvæling og umbygging av egnum bústaði.

Bjarni Djurholm: Løgtingsmál 130/93: Yvirøtka av lánunum í Húsalánsgrunninum soleiðis, at grunnurin kann viðgera støku sethúsalánini við støði í gjaldsmøguleikum hins einstaka. (Uppskotið ikki fingið løgtingsviðgerð enn).

Fólkaflokkurin: Løgtingsmál nr. 158/92: Tiltøk at hjálpa teimum, ið sita við ovurhøgum sethúsa- og íbúðarlánum.

Í figgjarnevndarálitinum til sama mál hevur Sambandsflokkurin tvey alternativ uppskot - tað fyrra við einum rentufrádrátti omanfyri ávísan prioritet og tað seinna við einum kvadratmeturfrádrátti.

Fólkaflokkurin: Løgtingsmál nr. 192/92: Setan av nevnd til at koma við uppskotum um, hvussu búskapurin í landinum kann byggjast upp aftur (uppskotið byggir á arbeiðið, sum ein arbeiðsbólkur við Kjartani Kristiansen á odda hevur lagt fram, og sum hevur fingið drúgva umrøðu).

Figgjarnevndarálit til figgjarlógina fyri 1994: Minnilutaálit frá Anfinn Kallsberg, sum byggir á uppskot, nevnt omanfyri.

Tordur J. Niclasen: Løgtingsmál nr. 86/1993: Samskifti landsstýrisins við peningastovnar og ábyrgd landsstýrisins at lætta um trongstøðu hjá húsarhaldunum.

Fólkaflokkurin: Løgtingsmál nr. 78/1993: Endurreisn av húskapinum, lækking av skattatrýsti, umlegging til bruttoskatt og lækking av kostnaðarstøðinum.

Tað eru óivað onnur uppskot við, sum hava fingið viðgerð í tinginum, og sum peika í somu ætt. Tað er lætt fatuligt, at tað kann vera torført at viðtaka hesi uppskot hvørt einsæris, men tað førkar ikki tann veruleika, at uppskotini øll innihalda elementir, sum kundu verðið rættað til og sett saman, helst við øðrum elementum, sum ikki enn eru komin fram, og sum so kundu verðið sett saman til eina heild og verðið ein loysn á hesum fyri samfelagið so álvarsama trupulleika.

Tí verður sett fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt í samráð við bankar, sparikassar, húsalánsgrunn og sethúsaeigarafelagið at seta eina skjótt virkandi nevnd til at gera uppskot um, hvussuleiðis kann skipast fyri, soleiðis at skuldin hjá teimum húsaeigarum, sum eru ringast fyri í dag, kann umskipast og fáast til at samsvara við inntøkumøguleikunum í framtíðini.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) tekur undir við málinum.

2. viðgerð 22. mars 1994. Uppskotini I og II fullu við ávikavist 8-0 og 12-0 atkvøðum. Uppskotið frá minnilutanum fall við 15-0 atkvøðum.

76 Løgtingið ger kanningarferð til Oynna Mann (Isle of Man)

Ár 1994, týsdagin 18. januar legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at seta ein 9-mannabólk, við t.d. 1 umboð fyri Toll- og Skattstovuna, 1 fyri Hagstovuna, 1 fyri figgjardeildina í Tinganesi, 2 fyri vinnufeløgini og 4 umboðum úr løgtinginum (helvt um helvt úr samgongu og andstøðu) til eina viku langa kanningar- og kunningarferð til Oynna Mann við atliti til at finna fram til, hvussu henda grannabyggin hevur dugað at sloppið sær undan tí búskaparkreppu, sum er um at beina fyri Føroyum.

Viðmerkingar

Búskaparstøðan í Føroyum er flestum kunnugt heilt út av lagi. Tí hava vit meir enn nakrantíð fyri neyðini at leita eftir, kanna og brúka øll hugskot til at venda tí skeivu gongd, sum flest øll politisk tiltøk higartil hava ríkið okkum alt longri út í.

Tað skuldi ligið nokk so nær at leita okkum ráð hjá grannum okkara, t.d. á Oynni Mann, sum vit kenna frá Oyggjaleikum og politiskum vinavitjanum, uttan tó at nakað ítøkiligt er komið burturúr.

Í eini roynd at vísa á onkur nýtilig fyridømi varð skipað fyri eini 19-manna kunningarferð úr Føroyum til Mann í sept. 93. Úr Føroyum luttóku umboð fyri m.a. fakleløg, almennar stovnar, trygging, bankar, vinnulív og ferðavinnu. Eitt blað sendi umboð og fekk nógv burturúr. Hóast onnur høvdu høvi at vera við, eisini tíðindamonopolini, var eingin áhugi, heldur ikki aftaná.

Men ein bólkur av næmingum á Føroya Handilsskúla gjørdi í 1992 námsferð til Mann og legði úr hondum eina rósverdugt holla frágreiðing um ferðina og tað, tey fingu at vita um grannaoyggj okkara í Írska Havinum.

Við at biðja um upplýsingar og taltilfar undan 19 manna ferðini í fjør og eisini við væl skipaðum fyrilestrum á høgum støði í høvuðsstaðnum Douglas gjørdist luttakarunum greitt, at føroyingar kundu lært almikið um, hvussu Mann-búgvar í ein mansaldur hava evnað at inurættað seg politiskt og búskaparliga til at tryggja samfelag sínum eitt nógv dyggari tilverustøði enn vit hava dugað.

Nú er ferðasambandið sjóvegis við Bretland gott, regluligt og bíligt alt árið. Sjálvt um løgtingið rindaði einum ferðalag sum hesum uppskotna part av ferðini (t.d. við Smyrli til

Aberdeen) til Oynna Mann (og luttakararnir sín part), kundi íblásturin av slíkari kanningarferð helst verið so hentur, at vitjanin varð ein byrjan til at sleppa úr tí ruðuleika, sum nú valdar í Føroyum.

Til tess at geva løgtinginum eina hylling á líkheitum og munum millum oyggjasamfelagið Føroyar og oyggjarsamfelagið Mann, kundi henda sammeting verið leiðbeinandi:

Felags uppruna
Føroyingar og Mann hava felags norðurlendskan uppruna og vóru í víkingaøldini sjálvstøðug høvdingadømi. Føroyar eru partur nú av danska, Mann av bretska ríkinum, bæði við hvør sínum lóggávutingi og "landsstýri".

Heimastýri
Av 24 fólkavaldum limum í manska lóggávutinginum, Tynwall, eru flestir valdir uttan floksmerki. Á Mann sýnist politiskt ábyrgd hjá einstøkum tinglimum móti húskapinum sum heild at telja meira enn hugurin hjá tingmonnum, sum í Føroyum, til at taka (skatta)-pening frá borgarum fyri at økja almennu nýtsluna.

Gongdin í fólkatali
Mann uppplivdi minking í fólkatali orsakað av fráflyting frá 55.000 íbúgvum í 1950 niður í 47.000 íbúgvar í 1960. Men í 1961 gjørdi Tynwall av at lækka skattatrýstið úr 80% marginalt (av forvunnari inntøku og 98%(!) av rentuinntøku) heilt niður í 21,5% marginalt av bruttoinntøku. Henda skattalækking virkaði, sum tá "ælið freka fót sína kós", og síðan tá hevur fólkatalið á Mann ment seg støðugt upp í nú 70.000 fólk. (Í Føroyum er skattatrýstið bert økt, og fólkatalið er tí í minking).

Handilsstøða við EU
Føroyar hava avmarkaða handilsavtalu, men Mann hevur fríhandil ella tollsamgongu við EU, sum Bretland tryggjaði oynni við EF-limaskapi sínum í 1972. Afturfyri er Mann bundið av at hava somu avgjaldsskipan (t.d. MVG) sum U.K. Sostatt er marknaðarstøðan hjá Mann væl sterkari enn tann føroyska.

Arbeiðsmarknaður
Í Føroyum búgva nú uml. 45.000 fólk, ein afturgongd upp á 3.000 síðan 1988. Mann hevur um 70.000 íbúgvar og støðugan vøkstur í fólkatali. Samlaða arbeiðsmegin í Føroyum var um 23.000 fólk upp á tað mesta, ella uml. 47% av íbúgvaratalinum. Á Mann eru uml. 34.000 fólk í vinnu, t.e. um 48% av íbúgvunum. Í Føroyum eru uml. 5.000 fólk arbeiðsleys (umframt 4.000 fólk rýmd). Á Mann eru bert uml. 1.400 fólk arbeiðsleys, uml. 3%. Fakfeløgini á Mann eru skynsom, tí tey liggja undir minni skattatrýsti enn tey føroysku.

BTÚ ialt og pr. íbúgva
Í Føroyum er BTÚ uml. 5,1 mia. kr. (í 93, sum er lækkað úr uml. 6,2 mia. kr. í 1989). Mann hevur sama BTÚ, nevniliga um 5.2 mia. kr. sum Føroyar, men støðugt vaksandi. Altso er føroyska BTÚ-ið uml. 110.000 kr. pr. íbúgva, meðan BTÚ hjá Mann er bert um 70.000 kr. pr. íbúgva.

Statsstuðul
Føroyar fáa danskan statsstuðul, nærum 1.000 mió. kr. árliga. Mann fær ongan stuðul úr

London, men rindar stjórnini í Westminister fast gjald árliga aftur fyri at fáa lut í bretsku verjuni og uttanríkistænastuni.

Fíggjarlógir
Fíggjarlógin hjá løgtinginum er officielt um 2.500 mió. kr. árliga, men almenna nýtslan er stútt vekk 500 mió. kr. hægri, enn føroyska samfelagið orkar at gjalda. Fíggjarlógin hjá Mann er júst 2.000 mió. kr. Tí almenna er ikki loyvt at hava fíggjarhall. Flestu ár er um 5% rakstraravlop, og Mann hevur tí ein "stabiliserings"grunn upp á smáar 1.000 mió. kr. at standa ímóti við.

Almenn nýtsla pr. íbúgva
Meðan almenna nýtslan (land og kommunur) í Føroyum liggur um 70.000 kr. pr. íbúgva, er hon á Mann bert um 30.000 kr. árliga, t.e. 60% lægri. Sostatt kostar almenni raksturin í Føroyum 35% meir enn tann manniski, hóast mannbúgvar eru 35% fleiri í tali enn føroyingar.

Uppbýti av fíggjarlóg
Sum velferðarsamfelag hevur Mann nakað sama lutfalsliga uppbýti av útreiðslum og játtanum til teir ymsu almennu stovnarnar á fíggjarlógini sum Føroyar. Men væl lægri játtanir til samferðslu (tí Mann er ein oyggj og slættari enn Føroyar) og nærum ongar vinnuligar studningsjáttanir, (ikki neyðugt, tí kostnaðarstøðið, skattur og lønir, eru lægri enn í Føroyum).

Býtið millum almennar inntøkur
Í Føroyum eru almennu inntøkurnar (hjá landi og kommunum) býttar uml. 2/3 (um 1.200 mió. kr.) frá inntøkuskatti og uml. 1/3 (uml. 900) frá MVG og avgjøldum (umframt statsstuðulin). Mann fær uml. 55% (1.000 mió. kr.) frá beinleiðis skatti, og uml. 45% (900 mió. kr.) frá óbeinleiðis skatti, MVG o.ø. avgjøldum. Restin, um 100 mió. kr. fær Tynwall frá rakstraravlopi hjá postverki, rentuvinningi av almennari uppsparing o.s.fr.

skattabýti og avgjøld
Føroyar fáa 95% av øllum skattainntøkum frá beinleiðis persónsskatti. Lítil og eingin inntøka kemur í landskassan frá partafelagsskatti, av tí at tað høga kostnaðarstøðið í Føroyum forðar at kalla øllum vinnuvirkjum í at hava so mikið sum rakstraravlop. Á Mann gevur persónsskatturin uml. 500 mió. kr. (60%) av øllum inntøkuskattinum, meðan vinnu-, handils-, fíggjar- o.a. fyritøkur rinda uml. 400 mió. kr. (t.e. 40%) av beinleiðis skattinum. At vinnulívið rindar so nógvan skatt kemst av, at virkini á Mann geva rakstraravlop, tí kostnaðarstøðið og skattatrýstið eru so lág.

Av óbeinleiðis inntøkum fær hitt almenna á Mann um 500 mió. kr. frá MVG, og hinar 400 mió. kr. frá øðrum avgjøldum, skráseting, punkt-, olju-, tubbaks-, rúsdrekka- o.ø. gjøldum.

Skattatrýst
Føroyska MVG-ið er 25%, tað á Mann "bert" 17% (sama sum í UK). Beinleiðis skattatrýstið í Føroyum hækkar so hvørt, sum inntøkurnar lækka, og er nú farið upp um 40% í miðal. Marginalskattatrýstið (t.e. skatturin av seinast vunnu krónu) í Føroyum liggur nú í miðal um 57%. Á Mann er marginalskatturin bert 20%. Fyrst forvunnu 60.000 kr. hjá hvørjum skattgjaldara (120.000 kr. hjá hjúnum við einari inntøku (ella tveimum inntøkum) eru skattafrí. Inntøka millum 60.000 og 120.000 hjá støkum skattgjaldara (tað dupulta hjá

hjúnum) ber 15% skatt, og øll inntøka omman fyri 120.000 kr. verður skattað 20%.

Altjóða skipaskrásetingin
Í føroyska FAS eru 14 skip skrásett, øll føroysk. Í altjóða skipaskrásetinginni hjá Mann eru 118 skip skrásett, flestøll útlendsk, upp á tils. 2,9 mió. tons deyðvekt.

Tryggingar og bankar
Í Føroyum hava vit 1 tryggingarfelag (við undirdeildum). Á Mann eru um 130 tryggingarfeløg skrásett, flestu sum undirdeildir við tryggingaruppgávu hjá altjóða fyritøkum (so nevnd "captive insurance companies"). Í Føroyum eru tveir bankar, skjótt lagdir saman í ein monopolbanka. Á Mann eru 64 skrásettir bankar, harav 5 reka vanligt innláns- og útlánsvirksemi á oynni. Hinir um 60 bankarnir reka altjóða bankauppgávur fyri móðurbankarnar í ymsum londum. Mann hevur egna bankalóggávu og egið fíggjareftirlit við bankunum, strangari enn í flest øðrum londum við tí úrsliti, at í mong ár er eingin banki á Mann farin undir hamaran (hóast móðurbankin hjá einum fór av knóranum herfyri, men ikki deildin á Mann, tí hon var so væl stovnfest). Tó smáir bankar, tí samlaðu innlánini í hesum 64 bankunum á Mann eru "bert" um 100 mia. kr. (móti 6 mia. kr. og fallandi í samlaðum innlánum í Føroyum).

Vinnulív og partafeløg
Í Føroyum eru um 1.800 partafeløg skrásett. Á Mann ger lagaliga vinnuliga skattaskipanin, í mesta lagi 20%, at eini 34.000 partafeløg eru skrásett.

Vinnuliga uppbýtið
Í Føroyum er fiskivinnan høvuðsvinna. Hon tryggjar um 40% av framleiðsluvirðinum, BTÚ. Á Mann er fíggjar- og tryggingarvinnan høvuðsvinnan. Hon umboðar umf. 35% av BTÚ. Fiskivinna og landbúnaður umboða bert 3% av BTÚ. Mann keypti í 1977 eitt 12 fjórðinga fiskimark frá Bretlandi og Írlandi. Í Føroyum er hitt almenna nógv størsti arbeiðsgevari við umf. 35% av øllum lønarútgjaldinum. ALS er næst størsti einstaki "arbeiðsgevari" og rindar um 11% av útgoldnum "lønum".

Á Mann arbeiða:
5.450 fólk í "professionellu" tænastuvinnuni (bókh., grannskoð., løgfrøði, tekn. ráðgeving, verkfrøði, arkitekt, teldutænastu, priv. heilsurøkt o.s.fr.). (T.e. 17%).

4.350 í fíggjar- og tryggingarvinnuni	(14)
3.450 í framleiðsluvinnuni	(12%)
3.400 í byggivinnuni	(11%)
3.000 í handli og smásølu, 800 í heilsølu	(12% alt)
2.850 í privatum tænastuvirkjum	(9%)
2.400 í flutningi og samskifti	(8%)
2.150 í almennari fyrisiting	(7%)
1.400 í matstovum og undirhaldi	(5%)
1.200 í landbúnað og fiskivinnu	(4%)
860 í ferðamannavinnu	(3%) og
500 í hita, gassi og ljóðframleiðslu	(2%).

Lønarlagið
Í Føroyum liggur tímalønin á 85-95 kr. brutto. Á Mann er hon niðri á helvminginum av hesum. Men skattatrýstið í Føroyum er 2-4 ferðir so høgt fyri vanliga ársinntøku, sum skattatrýstið á Mann. Príslagið í Føroyum er eisini væl hægri enn á Mann. (Tí livst líka væl fyri 30-40 kr. í tímaløn (netto) á Mann sum fyri 70-80 kr. um tíman (netto) í Føroyum, sum ein fakfelagsleiðari tók til í blaðsamrøðu eftir Mann vitjanina.) 65% av øllum lønum á Mann liggja millum 1.300 og 3.000 kr. um vikuna (t.e. 4.000 og 12.000 kr. um mánaðin). Lága kostnaðarstøðið á Mann (uml. 85% av tí bretska) ger, at alt vinnuligt virksemi loysir seg betur enn í flest øllum grannalondum. Hetta halda mannbúgvar vera rætt og neyðugt, tí eitt oyggjarsamfelag hevur aðrar ófyrimunir, eitt nú flutning, samskifti o.a. at dragast við í harðari kapping við grannalondini.

Húsamarknaðurin
Føroyski húsamarknaðurin hevur verið einsháttaðum og stívur við lítlum prismuni á smærri og størri húsum. Alt kostaði ov nógv í áttatiárunum, tá húsatrot var. Nú kosta flest hús ov "lítið", tí nú er avlop av húsum á marknaðinum. Á Mann er húsamarknaðurin nógv meir fjøltáttaður, frá íbúðum til stór sethús. Húsaprísurin liggur frá um 300.000 kr. fyri lítla íbúð til milliónir fyri stór hús. Eini miðal sethús kosta um milliónina. Sethúsahandilin er lívligur. Úrvalið er stórt, og tað sýnist tryggja rimiliga príslegu.

Ferðamannavinnan
Fram til fyrst í 60-árunum var ferðamannavinnan týdningarmesta inntøkan hjá Mann. Hon gevur enn fitt í kassan. Myndugleikarnir leggja doyin á at hjúkla um hesa vinnugrein. eini 460.000 útlendingar vitja árliga oynna, mest í ørindum, men eisini í ferju. Bert um 50.000 útlendingar vitja Føroyar árliga.

Fríhavn
80.000 fermetrar eru avsettir til "fríhavn", sum er toll- og skattafrítt øki til virki, sum eftir serligari avtalu framleiða til útflutnings. Túsundtals mannbúgvar arbeiða í framleiðslu og tænastu á hesum fríøki á eini 200 smávirkjum, sum hava roynst góð inntøkukelda. Fríøkið hevur lagt lunnar undir manga framleiðslu og manga fyritøkuna, ið annars høvdu havt stravna byrjan.

Mentan
Tynwall leggur stóran dent á at varðveita siðaarvin hjá Mann. Oyggin hevur havt sítt egna fólk, serskilda politiska skipan, egið mál og mentan allar tíðir. Nú eru tríggjar avísir, sum koma eina ferð um vikuna hvør. Útvarp er í Douglas, sum sendir frá 6.30 á morgni til 01.00 morgunin eftir, altso 17½ tíma um samdøgrið. 23 fólk arbeiða heiltíð umframt leyst fólk. Umsetningurin er 8 mió. kr. árliga, harav 6,5 mió. kr. eru lýsingarinntøkur. Restin fæst frá tí almenna.

Støðug viðurskifti
Tað, sum eyðkennir samfelagslivið á Mann, eru tey støðugu viðurskiftini. Tynwall hevur lagt ovurstóran dent á at geva íbúgvunum á oynni og áhugaðum útlendskum fyritøkum, skipafeløgum, tryggingarfeløgum, bankum og vinnuvirkjum ta grundfestu fatan, at

1. Mann er stabilt politiskt, sosialt og búskaparligt umbvørvi.
2. Lóggávan og skattalagið hava undirtøku millum manna og draga at sær.
3. Almenn tænasta virkar skjótt og væl, mest vinnulívinum til stuðuls.

4. Kostnaður á almennum tænastum er lágur (at almenni sektorurin er bíligur).
5. Virðing stendst um almenna eftirlitið við øllum virksemi.
6. Professionel almenn og privat ráðgeving fæst á hægsta stigi.
7. Nóg mikið er av professionelt útbúnum fólki at ganga vinnulívinum til handa.
8. Professionellar tænastur til vinnulívið eru bíligar.
9. At rættarskipanin, serliga gerða- og arbeiðsrættur, virka skjótt og væl.
10. Ein hin fremsta uppgáva hins almenna er at laga seg skjótt til altjóða krøv.

Sammett við hesi krøv, sum myndugleikarnir á Mann seta til sín sjálvs, kann hvør gera sær sínar metingar um Føroyar. Ein fakfelagsleiðari, sum var við á Oynni Mann í september skrivaði í bløðunum eftir heimkomuna, at í Føroyum valdar reint "anarki", t.e. lógloysi. Úrslitini tala fyri seg.

1. viðgerð 2. februar 1994. Málið varð beint beinleiðis til 2. viðgerð.

2. viðgerð 17. februar 1994. Við 17-0 atkvøðum varð málið beint í fíggjarnevndina, sum 22. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 18. januar 1994 og eftir 1. viðgerð 2. februar 1994 beint beinleiðis til 2 viðgerð.

Eftir 2. viðgerð 17. februar 1994 varð málið beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meirilluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen, Helena Dam á Neystabø og Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við málinum.

Minnilutin (Birgir Danielsen) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja fyriliggjandi uppskot til samtyktar.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) tekur undir við uppskotinum og mælir til at samtykkja tað.

Framhaldandi 2. viðgerð 24. mars 1994. Uppskotið fall við 5-0 atkvøðum.

77 Avtøka av MVG-gjaldinum á arbeiðsløn

Ár 1994, hósdagin 20. januar legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at avtaka MVG-gjaldið á øllum arbeiðsløgnum.

Viðmerkingar

Nýggj og tá óroynd óbeinleiðis skattaskipan. Meirvirðisgjaldið, MVG, kom í gildi frá 1. januar 1993. Hon hevur verið nýtt leingi í flest øllum londum á okkara leið (Momsur í Danmark, "Value Added Tax" VAT í Bretlandi o.s.fr.).

Orsøkin til hesa umlegging frá vanligum innflutnings- og punktgjøldum var serliga, at nýggi handilssáttmáli Føroya við EF (nú ES) eftir kravi frá Brussels var treytaður av, at europeiskar vørur á føroyska marknaðinum stóðu javnbjóðis føroyskt framleiddum vørum í fríari prískapping. Altso at føroyskur verjutollur skuldi ikki longur verða innfluttum europeiskum vørum ein forðan á føroyska marknaðinum.

Landsstýrið metti tá, at MVG var minni bági fyri føroyska framleiðslu enn einhvør onnur skipan, eitt nú framleiðslugjøld á føroyskar vørur. Hetta var ivaleyst rætt hugsað.

Ovurstórt arbeiði lá í at umleggja óbeinleiðis skattaskipanina frá ørgrynnu av einstøkum tollsatsum, punktgjøldum, innflutnings- og øðrum avgjøldum til einsháttað MVG-gjald.

Upprunaliga var MVG-ið 23%. Vøruprísirnir yvirhøvur hækkaðu nærum ikki, eftir at MVG hevði avloyst gomlu og sera fløktu punktgjaldsskipanina. Nógv vørusløg, eitt nú vanligar húsarhaldsvørur, klæði, skógvar o.a. vórðu bíligari enn frammanundan. Í so máta hevur MVG-ið roynst brúkarunum væl. Men tað hevur lagt nakrar eyka arbeiðsbyrðar á MVG-skyldugar vinnufyritøkur. Frammanundan bar innflutningsvinnan tað mesta av arbeiðinum við at avrokna punkt- og innflutningsgjøldini.

Sosialistiska landsstýrið, sum kom til í apríl 93, hækkaði MVG-gjaldið upp í 25%.

Nú er MVG-skipanin roynd í 1 ár. Vit vita, at hon gevur landskassanum fitt av inntøku, tó ikki tær 563 mió. kr., sum ætlað fíggjarárið 93. Sum við øllum øðrum væntaðum inntøkum, nú beinleiðis og óbeinleiðis skattatrýstið er við at trýsta búskapin undir heilt.

Í fíggjarlógini 94 er MVG inntøka bins almenna lækkað til 440 mió. kr. Ivaleyst eisini ov høgt, tí búskapurin verður alsamt meir niðursjóðaður av tí førda skattapolitikkinum.

Serliga á einum øki, henda royndir á, er MVG-skipanin skaðagripur. MVG-gjald á arbeiðsløn hevur darvað handverks-, ídnaðar-, framleiðslu- og tænastuvinnuni almikið. Fleiri virki geva MVG-num skuldina fyri, at tey eru farin á húsagang. Ið hvussu er, stríðast hesar vinnugreinar fyri lívinum, so hvørt sum "svart arbeiði" er vorðið alt meir vanligt, ofta tí handverkarar hava ikki annað val enn at arbeiða uttan fyri vanligu skattaskipanina, skulu teir yvirliva. MVG-skyldugar fyritøkur hava einki val enn enn at lúka almennu treytirnar og kunnu als ikki klára kappingina móti svørtum arbeiði.

Eitt dømi um skeivleikarnar er hetta:

Skal vanligur løntakari biðja handverksvirki umvæla okkurt smávegis, kostar handverkara-tímin kundantum minst 170 kr. (95 kr. brutto tímaløn + 45 kr. verkstaðarkostnað + 25% MVG). Kundin, sum biður handverksvirkið umvæla og rindar 170 kr. fyri umvælingina, tí hann rindar upp ímóti 50% í skatti av síni egnu inntøku.

Tað merkir, at kundin skal forvinna 340 kr. fyri at handverkarin skal í sín part fáa 50 kr. netto (eftir sín skatt) fyri ein arbeiðstíma. Altso alt tað, sum liggur ímillum 340 kr. og 50 kr. (undantikið verkstaðarkostnaðin, 45 kr., sum virkið má gjalda skatt av) stingur landskassin av við, altso uml. 270 kr. So illa hevur hitt almenna løstað hetta samfelagið.

Eyðvitað loysir tað seg betur hjá bæði kunda og handverkara at gera sínamillum avtalu, so handverkarin fær sum mest av vanligari tímaløn, tí alt loysir seg hjá honum aftan fyri nettolønina eftir skatt. Fyri kundan loysir tað seg betur at gjalda svarí 50-90 kr. enn 170 kr. sum verkstaðarrokningin ljóðar uppá.

MVG-ið á arbeiðsløn man eiga sín part av skuldini fyri, at fylgjandi vinnugreinar hava havt hesa afturgongd í lønarútgjaldingum í fjør:

	1992	1993
Teknisk umvæling og smíð:	103 mió. kr.	75 mió. kr. (-28 mió. kr.)
Ídnaðarframleiðsla:	133 - -	106 - - (-26 - -)
Byggivinnan:	164 - -	99 - - (-65 - -)
Handil, gisting o.t.:	386 - -	315 - - (-71 - -)
Informatiónstænastur:	101 - -	75 - - (-26 - -)
		(-216 mió. kr.)

Ein kvalifiserað meting sigur, at tilsamans gevur MVG av tímalønum landskassanum uml. 120 mió. kr. árliga. Neyv hagtøl verða ikki tøk fyrrenn um einar tveir mánaðir, sigur Hagstovan. Men so leingi hava tær fyritøkur, sum berjast fyri lívinum nú móti MVG-gjaldinum, ikki ráð at bíða. Løgtingið heldur ikki.

Tí er altumráðandi, at løgtingið sær álvaran í hesi hóttan og avtekur MVG-gjaldið á arbeiðsløn alt fyri eitt.

Hóast landskassin missir nakað av peningi, tó í mesta lagi nakrar 10 mió. kr. tilsamans árliga, tí MVG-gjaldið fyri arbeiðsløn verður avtikið, so merkir henda lógarbroyting lív ella deyð fyri partar av vinnulívinum, serliga handverks-, handils- og ídnaðar- og tænastuvinnuna.

Henda broyting førir ikki bert til, at hópi av vinnuvirkjum kann verða lív lagað. Men avtøkan ger eisini, at fittur partur av teim handverkarum, sum nú eru tvingaðir til at arbeiða svart (fyri ikki at sita sørir fyri einki), sleppa aftur til vanligt arbeiði. So vinna land og kommunur vanligan skatt aftur frá hesum nú ikki skattgjaldarum. Ivaleyst telja hesin afturvunni skattur og tað sparda arbeiðsloysisgjaldið meiri, enn tað lítla, sum landskassin missir í MVG-gjaldi, um MVG-gjaldið við hesum uppskotið verður avtikið á arbeiðsløn.

1. viðgerð 2. februar 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 24. februar 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 20 januar 1994 og eftir 1. viðgerð 2. februar 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er vitandi um, at landsstýrið arbeiðir við júst somu sparingum, og at úrslitið av hesum arbeiði verður kunnað tinginum seinri.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Lasse Klein, Jacob Lindenskov, Heini O. Heinesen og Jógvan Sundstein) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Finnbogi Arge) tekur í prinsippinum undir við uppskotinum, men vísir á, at upskotsstillarin ikki hevur útgreinað hvussu inntøkulækkingin, sum fyrstu tíðina stendst av uppskotinum, verður fíggjað.

2. viðgerð 7. apríl 1994. Uppskotið fall við 8-0 atkvøðum.

78 Endurreisn av búskapinum, lækking av skattatrýsti, umlegging til bruttoskatt og lækking av kostnaðarstøðinum

Ár 1994, týsdagin 18. januar legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi:

Viðmerkingar

Verandi skattaskipan hevur spælt fallit, rent búskapin á ørmandarhús og mist álit og undirtøku millum manna. Progressiva skattingin við hægri prosenti á hægri inntøkur varð upprunaliga

ætlað at javna og umbýta inntøku eftir skatt frá teim høgu til tær lágu intøkurnar. Men hetta "millumeturrættvísið" er endað við ólíðiligum 45-55% skattatrýsti á miðal inntøkurnar. Í miðal rindar hvørt húsarhald árliga 100.000 kr. í beinleiðis skatti til hitt almenna (land og kommunur) umframt 70.000 kr. árliga í MVG og tolli. Í miðal hevur hvørt húsarhald langt undir hesa upphædd eftir til aðrar neyðugar útreiðslur, rentur, avdráttir, mat og klæðir. 170.000 kr. halda flestu føroyingar vera alt ov høgan prís at gjalda fyri almenna raksturin.

Hetta sosialistiska landsstýrið ofrar gleðiliga velferð einstaklingsins fyri at halda almenna marglætinum uppi. Bara tørvur hins almenna verður nøktaður upp á bekostning av einstaka húsarhaldinum. Úrslitið er "aktiv mótstøða" móti skattaskipan úttrykt í svørtum arbeiði fyri 100-tals mió. kr.

Skattatrýstið hevur pressað lønarlagið langt upp um alt vinnuligt lønsemi, og høga kostnaðarstøðið hevur beint fyri øllum kappingarføri. Arbeiðsloysið er øramdi stórt og vaksandi, umframt at 4.000 føroyingar eru rýmdir uttanlands í eini vaksandi flóttaflóð undan hóttandi húsagangi. Framleiðsluvirðið (BTÚ) er fallið um 20% eftir trinum og tøka privata inntøkan tað dupulta, um 40%, eftir 5 árum.

Beinleiðis skattatrýstið er økt stútt. úr 35% í 1989 upp í 42% í 94 (íroknað arbeiðsmarknaðargjøld). Tað er hugvekjandi og avdúkandi, at so hvørt, sum skattatrýstið er harðnað, er skattainntøkan hjá landi og kommunum fallin, nevniliga úr 1.766 mió. kr. í 1989 niður í 1.360 mió. kr. í 93.

Vinnuligi sektorurin er dupult so hart raktur sum hin almenni, tí almenni sektorurin er lítið skerdur. Sostatt hevur vinnan og starvsfólkið har borið tað mesta av afturgongdini.

Nú má gerast upp við fortíðina. So høpisleyst er alt, at føroyingar í miðal arbeiða fyri landskassan til kl. 2 hvønn seinnapart, til mikukvøld hvørja viku fyri stovnsveldið, ja september mánað út hvørt ár, bara fyri hitt almenna. Bara frá kl. 2-5, frá hósmorgni til friggjakvøld ella frá oktober til árslok fáa fólk loyvi til sjálvi at beinalda tað, tey forvinna.

Skattaskipanin við harðnandi skattatrýsti má erstattast av eini arbeiðs- og virðiseggjandi skattligari nýskipan. Skattgjaldarin verður nú kroystur millum hert skattatrýst og fallandi løn. til hann at enda verður trýstur út í arbeiðsloysi. Fólkið má aftur fáa eina lívsvón. Hon fæst við at lata skattgjaldaran eiga t.d. 4/5 av síni inntøku eftir skatt. (Í løtuni tekur hitt almenna upp í 76 oyru av síðst forvunnu krónu. Tað merkir, at jú harðari vit arbeiða, jú størri part tekur landskassin frá okkum, og jú lutfalsliga minni eigur løntakarin).

Tað mátti verið ríkiligt, um vit øll vóru liðug at arbeiða fyri hitt almenna kl. 9.30 á morgni, til mánakvøld, ella til mitt í mars, og at vit so restina av tíðini arbeiddu fyri okkum sjálvi. Enn betri verður fullvissan um, at jú harðari, jú meiri og jú longur vit arbeiða, jú meir fáa vit sjálvi burturúr. (At so landskassans fimtingur av samlaðu inntøku okkara samstundis økist, er bara gott.)

Hesi uppskot bera m.a. í sær, at marginala skattaprosentið í landsskatti, t.e. prosentgjaldið av seinast forvunnu krónu, ikki fer upp um 20%. Tað merkir, at skattgjaldarin eigur altíð 80 oyru eftir av síni inntøku, fyrst eins væl og síðst forvunnu krónu. Umframt at allir inntøkubólkar verða lagaligari skattaðir eftir hesum uppskoti enn frammanundan, ber

uppskotið eisini í sær eina 40% lækking í øllum sáttmálainntøkum, almennum sum privatum, donskum sum føroyskum.

Men fyri allar inntøkubólkar, hjún sum støk, einstaklingar sum feløg, verður realløntin t.e. tann keypiorka, sum er eftir av lønini aftan á skatt, hægri enn frammanundan.

Hetta ber til, tí við 20% skatting av øllum bruttoinntøkum, A- sum B-inntøkum, almennum sum vinnuligum, føroyskum sum donskum lønum, samstundis sum allir frádráttir falla burtur, kemur só nógv meiri inntøka samanlagt til skattingar, sum frammanundan er skattafrí.

Men tríggjar upphæddir, sum nú svara til 1) rentufrádrátt av sethúsum, 2) barnafrádrátt og 3) pensiónsgjald, verða endurgoldnar hvørjum skattgjaldara, sum hann hevur rætt til.

Omanfyri nevndu skattligu og lønarligu broytingar krevja fyrst løgtingsins undirtøku sum uppskot til samtyktar. Síðan mugu lógaruppskot gerast í tráð við uppskotini. Viðmerkingarnar til uppskotini koma eftir hvørt uppskotið sær niðanfyri. Verða tí sett fram fylgjandi:

I U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at frá 1. mai 1994 verða allir lønarsáttmálar, hjá tí almenna, millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum, føroyskar og danskar lønir í Føroyum, lækkaðir 40%.

Uppskotið hevur uml. hesa <u>ávirkan á útreiðslur</u> landskassans:

<u>Útreiðslur</u>:

10. Løgtingið	9.000
11. Meginfyrisiting	80.000
12. Heilsumál	200.000
13. Samferðsla og samskifti	30.000
14. Útbúgving og gransking	210.000
15. Mentan	26.000
16. Fiskivinna, sigling o.t.	90.000
17. Landbúnaður	15.000
18. Vinnulív og arbeiðsmarknaður	30.000
19. Almannamál	650.000
20. Pensjónsútreiðslur	10.000
21. Effektivar veðhaldsbindingar	80.000
22. Rentuútreiðslur	400.000
Íløgur	100.000
Viðlíkahald	<u>50.000</u>
	<u>1.980.000</u>

Omanfyri nevndu útreiðslutøl koma fram við at lækka tilsvarandi tøl á løgtingsfíggjarlógini 94

við 40% har, sum nógv størsti parturin av útreiðslunum er lønir.

Almannamál kosta minni, tí fleiri fólk sleppa til arbeiðis og klára at forsyrgja sær sjálvum, um 25% bruttoskattur verður innførdur.

Játtanin til fiskivinnuna og vinnulívið kann bekkast í nakað sama mun, sum fiskiskip og vinnuvirki geva betri rakstrarúrslit orsakað av lægri kostnaðarstøði.

Útreiðslur til veðhaldsbindingar verða nakað lægri, tí við batnandi vinnuligum inntøkum falla nøkur veðhald ikki til gjaldingar.

Rentuútreiðslur verða lægri í ár enn mett, tí rentustøðið yvirhøvur er fallandi, og statslánini skulu umforhandlast til lægri rentu.

Íløgur og viðlíkahald røkka longur og til fleiri arbeiðspláss, tí kostnaðarstøðið felur.

(Annars er omanfyri nevndu tol í tráð við fólkatalsins álit í fíggjarnevndini til fíggjarløgtingslóg 1994.)

II Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at:

1. Allar A-, B- og partafelagsinntøkur verða skattaðar 20% av brutto.
2. Allir frádráttir í inntøkskatti falla burtur.
3. Fólkapensjónin ber ikki landsskatt.
4. Rentufrádrátturin, svarandi til 40% av miðal prioritetsrentu fyri eini sethús, upp til 1.000.000 kr. í byggikostnað, eina ferð í lívinum, forrentað yvir 20 ár, rindar landskassin lánsstovnunum, so sethúsaeigarin ber tilsvarandi lægri rentu.
5. Barnastyrkur.
   7.000 kr. fyri ávørt barnið fyri inntøkur undir 100.000 kr.
   6.000 " " " " " " millum 100 og 200.000 kr.
   5.000 " " " " " " " 200 og 300.000
   o.s.fr. rindar landskassin árliga foreldrunum.
6. Landskassin rindar Føroya Lívstrygging pensjónsgjald, 9.000 kr. burtur av skattinum hjá hvørjum skattgjaldara, sum enn ikki er eini samlags-, felags- ella einstakar trygging.
7. Vinnuvirki fáa útgoldið vinning, higartil avsettur í grunnar, og rinda 20% skatt av honum, eins og av komandi brutto rakstrarvinningi.
8. Kommunuskatturin má ikki fara upp um 10% av bruttoinntøku og verður at álíkna eftir landsskattin.
9. Fíggjarognaravgjaldið verður avtikið, og allar rentuinntøkur skattaðar 20%.

Viðmerkingar til uppskot til samtyktar II:

Uppskotið hevur sammett við verandi skattaskipan hesar broytingar við sær:

Ad. 1: Í staðin fyri verandi "netto"-skipan, fáa vit brúttoskattaskipan, so hvør forvunnin króna í A- eins og B-inntøku, hjá einstaklingum sum hjá vinnuvirkjum, verða skattað 20%. Sostatt tryggja vit, at t.d. 400.000 kr. inntøka verður veruliga rindar 4 ferðir so nógvan skatt (umframt óbeinleiðis skatt) sum t.d. 100.000 kr. inntøka.

Uppskotið ber eisini í sær, at tað altíð loysir seg, serliga hjá lág- og miðalinntøkum at forvinna eyka t.d. við yvirarbeiði, tí 80 oyru verða altíð eftir í lumma skattgjaldarans av fyrst sum síðst forvunnu krónu. (Sum er tekur hitt almenna støugt hægri part, ja heilt upp í 76 oyru, av síðst forvunnu krónu.) Proportional 20% skatting eggjar altíð til meir virksemi og inntøku, einstaklingum, vinnulívi og tí almenna, ja búskapinum øllum til fyrimuns. Fleiri arbeiðspláss verða, sum høvdu breiðkað skattliga grundarlagið, umframt at tað eisini hevði minkað óhaldbæra trýstið á ALS.

Verandi skattaskipan virkar soleiðis, at marginala skattatrýstið, t.e. skattur av síðst tervunnu krónu, nú er í miðal 57%, ja, enntá hægri fyri summar inntøkur. Nú er miðal skattatrýstið hetta:

Skattskyldug innt. millum		30 og 100.000 kr.	verður nú skattað			25%
"	"	"	100 og 200.000 kr.	"	"	" 37%
"	"	"	200 og 300.000 kr.	"	"	" 49%
"	"	"	300 og 400.000 kr.	"	"	" 51%
"	"	"	yvir 500.000 kr.	"	"	" 57%

(Hetta er sum sagt miðal skattatrýst, men á 2-300.000 kr. inntøku marginalskatturin upp í 76%!)

Eisini ber hetta uppskotið í sær, at tað slepst undan verandi diskriminering millum hjún við ávikavist einari og tveimum inntøkum. Higartil verður ein inntøka hjá húsarhaldi upp á t.d. 300.000 kr. nógv harðari skattað (revsað) enn tvær inntøkur upp á 150.000 kr. í part. Við 20% bruttoskatti verða hjún við einari og tveimum inntøkum javnstillað. Sama verða stakir skattgjaldarar og hjún.

"Sosiala" argumentið ímóti sama proportionala skattaprosenti av lágum sum høgum inntøkum dugir ikki longur. Veruleikin er tann, at eingin familja sum er kann liva av láginntøku, t.d. undir 100.000 kr. árliga. Flestu inntøkur undir 50.000 kr. í dag eru t.d. pensjónir (sum eftir hesum uppskoti verða skattafríar) ella hjáinntøka í húsarhaldi við tveimum inntøkum, har hin hægra inntøkan nú ber nógv harðari skatt, enn hon fer at bera eftir uppskotinum við 20% brutto skattatrýsti. (Víst verður eisini til Ad. 2, Ad. 5, Ad. 6 og Ad. 7.)

Eisini verðandi skattaskipan er stórur munur á skatting av felagum og privatpersónum og lørtakaraskatti. Munurin freistar nú til at "flyta" inntøku millum vinnuliga og privata inntøku. Eftir uppskotinum verða øll skattskyldug eftir somu reglum, persónar eins og vinnuvirki, partafelog o.s.fr., og hitt almenna fær fullan og sama ágóða burturúr við sama skatti á partafelog sum á einstaklingar.

Nú eru skattareglurnar fyri vinnuvirki so fløktar, at alt ov nógvar kreftir og peningur av neyð verða spilt burtur til skattasnildur. Alt samfelagið fær gagn av hesum uppskoti, tí at skattaspekulatión ikki longur loysir seg.

20% skattur av allari bruttoinntøku hevði lækkað verandi skattatrýst, sum nú noyðir hópin av fólki út í "svart" arbeiði. Hetta uppskot hevði sostatt drigið 100-tals mió. kr. árliga inn aftur í búskapin og tryggjað landskassanum skattainntøku av hesum arbeiði.

Fastur 20% bruttoskattur ger, at allar lønir og inntøkur verða trektar við sama lutfalli, nevniliga 1/4 hvørja lønarútgjalding, so ymisku og barðligu broytingarnar við verandi skattaavrokning frá lønarútgjalding til lønarútgjalding heldur uppat.

Ad 2: Verandi persóns- (løntakara-), pensjóns-, og serliga kautións og rentufrádráttur falla eftir hesum uppskoti burtur. Tað hevði ført við sær samsvar millum veruliga (brutto) inntøku og (verandi netto- ella) skattskyldugu inntøku. Nú er einki fantilsi millum tað, ið summi kunnu forvinna brutto, og tað, tey hava í skattskyldugari (netto) inntøku eftir (ofta stórar) frádráttir. Sostatt er verandi skattatalva misvísandi. Fleiri skattskyldugar "láginntøkur" eru veruliga miðal- og enntá háinntøkur, sum eru komnar illa fyri av vinnuligum tapum, kautiónum ella rentufrádráttum, sum aðrir skattgjaldarar bera kostnaðin av við hægri skattatrýsti, og lands- og kommunukassin missa við lægri inntøku.

Verður hetta uppskot samtykt, og skattalógin lagað tilsvarandi tí, fara tær stóru inntøkurnar at rinda nógvan skatt. (Allar royndir aðrastaðni prógva tað.)

Hin vegin ber 20% bruttoskattur tó tann møguleika í sær, at miðal- og háinntøkurnar eftir uppskotinum orka at bera hægri rentur, veðhaldsútlegg, pensjónsgjøld o.a. sjálvsvaldar útreiðslur enn higartil við verandi okurs skattatrýsti, sum hevur ørmaktað allar skattgjaldarar. Eisini verður tað lættari hjá vinnurekandi at spara upp til reiðar, veruligan partapening. So sleppa vit frameftir undan veðhaldum og lánum tí fløgur sum higartil.

Ein stórur vinningur við uppskotinum við lágum 20% bruttoskatti er, at einstaklingar og vinnulív høvdu styrknað av betri møguleikum til uppsparing, fløgur og fíggjarliga sjálvsábyrgd, sum nú kann holvast yvir á landskassan við frádráttarskipan.

Ad. 3: Uppskotið ber í sær, at fólka- og avlamispensjónir verða landsskattafríar. Verandi skattaskipan er fløkt og ørkymlandi fyri móttakarar av almannaveitingum, tí hitt almenna gevur við aðrari hondini og tekur aftur við hinari. (Krígspensjónin er feskasta dømi um skattligan ruðuleika og almennan kenslukulda.) Tað kostar pening at flyta pensjónir aftur og fram í skipanini. Tey gomlu og óhjálpnu hava sjálvsagdan rætt til at behalda tað lítla, tey fáa. (Verandi uppskot hevur eisini fyrimunir fyri pensjónistar, javnber Ad. 7.)

Ad. 4: Hvussu kommunurnar skatta almannaveitingar, kunnu tær sjálvar avgera í samráð við landsstýrið. Eftir hesum uppskoti hava tær rætt til at skatta upp til 10% av bruttoinntøkuni. Røkkur tað ikki til fíggjarskyldur kommunanna, kunnu tær fáa blokkstuðul e.t. frá landskassanum og/ella tær finna aðrar inntøkukeldur umfram.

Ad. 5: Í staðin fyri verandi skipan við 40% óavmarkaðum rentufrádrátti, rindar landskassin eftir hesum uppskoti føroyskum peningastovnum eina upphædd svarandi til 40% av

rentuútreiðslum til eini sethús upp til 1 mió. kr. fyri hvønn skattgjaldara, eina ferð í lívinum, við 20 ára niðurgjaldistíð. Hesa upphædd rindar skattgjaldarin sostatt minni í rentum fyri síni sethús.

Á henda hátt verður rentugjaldið flutt út úr skattaskipanini. Uppskotið tryggjar øllum inntøkubólkum javnbjóðis møguleika til at byggja sær sethús upp til kostnaðin av miðal býli, t.d. eina millión pr. húski. Verandi skipan hevur sosiala slagsíðu, tó hon loyvir óavmarkaðum rentufrádrátti, so at samfelagið hevur fíggjað óneyðuga dýrar íløgur í sethús. Av m.a. hesi orsøk eru húsaprísirnir farnir av lagi, og alt ov stórt tilfeingi er bundið í sethúsaskuld, sum er við at beina fyri samfelagnum. Tann, ið vil byggja større hús, má bera ovurkostnaðin sjálvur. Men tað fáa háinntøkurnar eisini høvi til við lágum 20% bruttoskatti.

Henda nýskapan í rentugjaldi til peningastovnar gagnar lægri inntøkum lutfalsliga mest og virkar sostatt fyri at gera hetta skattauppskot meiri sosialt rættvíst, enn verandi skipan er.

Ad. 6: Í staðin fyri verandi barnafrádrátt ber hetta uppskot í sær, at barnafamiljur fáa kontantgjald fyri hvørt barnið. Tað stuðlar partvíst foreldrum til at bera útreiðslur av børnum. Við útgoldnum barnastyrki eftir inntøku foreldranna virkar hetta uppskot eisini sosialt bøtandi, tí familjur við lægri inntøku fáa lutfalsliga og absolut større barnastyrk endurgoldnan enn foreldur við hægri inntøku.

Ad. 7: Verandi pensjónsskipan við beinleiðis yvirføring frá skattgjaldara til móttakara av almannaveitingum, pensjónum o.ø. er ótíðarhóskandi. Hon munar minni og minni, so hvørt talið á móttakarum, eldri og óhjálpnum, økist í mun til talið á arbeiðsførum, sum gjalda til skipanina. Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin er ein alment kend sorgarsøga, fyri honum er eingin vón. Hann gjørdist ein tála, tá landsstýrismaðurin í almannamálum broyt sítt politiska lyfti um at leggja arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin inn í Lívstryggingina. Útlitini hjá teim gomlu og óhjálpnu gerast daprari.

Tí ber hetta uppskot í sær, at eisini allir skattgjaldarar (og teirra hjúnafelagar), sum enn ikki hava slíka tryggingarskipan gjøgnum yrkisfelag ella einsæris, nú fáa høvi til at fáa fastan part av skattgjøldum sínum, her er upphæddin 9.000 kr. árliga skotin upp, flutt úr landskassanum yvir til Føroya Lívstrygging. Hin einstaki hevur so ábyrgd av egnari pensjónsuppsparing eftir persónligari avtalu og við Lívstryggingina, so trygging fyri avlamni, óvæntaðum deyða í arbeiðsførum árum og eftirløn fellur øllum borgarum landsins í lut.

Ein tryggingarskipan hjá Lívstryggingini er longu í gildi fyri túsundtals føroyingar. Fyrimunurin við hesi skipan er, at tryggingarupphæddin økist almikið av rentutilskriving. Hon hyldnast tí millum 5 og 10 ferðir (alt eftir galdandi rentustøði) betur yvir eitt arbeiðslív enn verandi beinleiðis almenna veitingarskipanin, sum ikki hevur hendan rentufyrimun.

Við føstum, einsháttaðum tryggingargjaldi, t.d. 9.000 kr. fyri allar borgarar er henda skipan eisini sosialt meir rímilig enn verandi skipan, har stórur frádráttarrættur (nú 30.000 kr.) fyri høgt pensjónsgjald verður mest brúktur av háinntøkum. Men aftur her merkir tann lági 20% bruttoskatturin, at hægri inntøkur framvegis fáa ráð til at tekna sær hægri tryggingar, uttan at landskassin ber kostnaðin av tí. 10.000 nýggir tryggingartakarar á t.d. 9.000 kr. árliga í Lívstryggingini hevði merkt falt 90 mió. kr. í eyka uppsparing í samfelagnum. (Lívstryggingin hevur sum er 55 mió. kr. í árligum inngjaldi.) Men serliga hevði henda tryggingarskipan

fyri øll avlastað Almannaskipanina sera nógv, ikki minst í framtíðini.

Ad. 8: vinnulívið liggur lamið serliga orsakað av alt ov høgum kostnaðarstøði, ringum kappingarføri og tiskil negativum rakstrarúrslitum. Fígging fæst ikki til nakað frá bankunum. Verandi 22% partafelagsskatting er stórur fyrimunur fram um gamla 49% skattin, og hjálpir hetta uppskotið skattliga tí bert lítið, nevniliga 2%. Men 40% lønarlækking hevði bøtt kappingarførið almikið. Vinnan hevði orkað at torrenta uml. 5-6 mia. kr. meir í íløgum enn við verandi lønarlag. Tað hevði gjørt allan munin.

Hetta uppskot miðar eftir at loyva øllum vinnuvirkjum at fáa uppsparingina, tey hava gjørt í farnum árum í roknskaparligar grunnar, útgoldna. Hon kann so skattast 20%, sum øll onnur inntøka. Avlupið kunnu so virkini bróka til at útvega sær nýggjan íløgu- og rakstrarkapital, so vinnulívið kann koma aftur í gongd. Men 20% bruttoskattur skapar betri fyritreytir fyri veruligari uppsparing hjá virkjum og vinnurekandi, so útlitini fyri betri stovnsfesting (konsolidering) batna almikið.

Ad. 9: Kommunurnar kunnu álíkna sín egna skatt sum higartil. Men ovugt av álíkning higartil skal landsskatturin eftir hesum uppskoti álíknast fyrst við 20%. Kommunurnar kunnu so álíkna sín skatt í samráð við landsstýrið.

Hugsa vit okkum, at kommunuskatturin falt verður fult álíknaður, nevniliga við 10% max av bruttoinntøkum, so merkir tað, at kommunurnar fáa 300 mió. kr. inn samanlagt við eini samlaðari lønarútgjalding, t.e. skattskyldugari inntøku falt, upp á 3.000 mió. kr.

Men av tí at 40% lønarlækkingin eisini kemur kommununum útreiðsluni til góða, fer lítið at vanta í, til at tær klára sínar skyldur. Tað, sum restar í, kann fáast tilvega eftir nærri avtalu við landsstýrið.

Ad. 10: Fíggjarognaravgjaldið, sum er ætlað at geva landskassanum 200 mió. kr. í ár, verður avtikið, so hesin nýggjasti offurbólkurin á sosialistiska landsstýrisins skattajakt, ikki verður eydrændur til tess at nøkta ómettandi hungur hins almenna eftir meiri pengi.

Uppskotið við 20% bruttoskatti hevur hesa <u>ávirkan á inntøkur</u> landskassans:

<u>Inntøkur</u>:

1. Inntøkuskattur 20% av 3.000 mió.kr.brt. inntøk	600.000
2. Toll-, nýtslu- og framl. gjøld (-fíggjarognaravgj.)	800.000
3. Onnur gjøld	20.000
4. Rentuinntøkur	40.000
5. Landsfyritøkur	15.000
6. Partur av avlopi Tjóðbankans	25.000
7. Ríkisstuðul	<u>800.000</u>
	<u>2.300.000</u>

Ad. 1: Tað kemst fram til henda inntøkuskatt, 20% av 3.000 mió. kr. soleiðis:

Lønarútgjalding í 93, umlt.	3.200 mió. kr.
Lækking í 94 umlt.:	200 " "
	3.000 mió. kr.
Minus 40% lækking, uml.	1.200 " "
	1.800 mió. kr.
B-inntøkur, uml.	400 " "
Innt. alt uml.:	2.200 " "
+Arbl.stuð.&alm.veit.uml.	300 " "
+virksemis-og innt. øking	500 " "
Brutto innt. tils. at skatta	3.000 mió. kr., sum skattað 20% gevur 600 mió. kr.

20 % bruttoskattur økir almikið um virkishugin hjá einstaklingum alt fyri eitt. Vinnulívið verður lønsamt aftur. Talið á arbeiðsplássum økist. Lønarútgjaldingarnar hækka í stórum, serliga um fiskiskapur og fiskaprísir batna. Tað svarta arbeiðið verður minni lønsamt, jú betur tað loysir seg at arbeiða opið og innan fyri búskapin. Tí er væntandi, at samlaðu lønarútgjaldingarnar longu sama ár ella ið hvussu er árið eftir, sum henda skattanýskipan kemur í gildi, verða væl hægri lønarútgjaldingarnar tilsamans 3.200 mió. kr. og skattskyldugu A- og B-inntøkurnar (pensjónir íroknaðar, sí viðløgdu útrokning frá Toll- og Skattstovuni) heilt uppi á 3.800 mió. kr., so at rokna við einum skattagrundarlagi upp á 3.000 mio. kr. er realistiskt.

Ad. 2: Toll- og nýtslugjøldini eru her sett til 800 mió. kr., sum er 120 mió. kr. lægri enn ætlað í løgtingsfíggjarlógini, tí hetta uppskot miðar eftir at sleppa landsins uppsparing á bók og smáspararum undan politiskari cyðræning til meira almenna nýtslu.

Allar aðrar inntøkur, rentuinntøkur, onnur gjøld, partur av avlopi Tjóðbankans og ríkisstuðul, eru óbroytt í hesum uppskoti sammett við fíggjarlógina 94.

Eftir hesum uppskoti sær úrslitið hjá landskassanum nakað soleiðis út:

Inntøkur:	2.300
Útreiðslur:	1.980
Avlop	320

Avlopið, um 320 mió. kr. verður at býta nakað soleiðis:

Rentuendurgjald til peningastovnarnar fyri sethúsarentu	155
Barnastyrkur: 15.000 børn x 5.000 kr. í miðal	75
Pensjónstrygging (Før. Lívstrygging) til øll uttan eftirløn 10.000 x 9.000 kr.	90
Tilsamans	320

III Uppskot

til

samtyktar

Grunn til fígging av húsalánum.

Løgtingið samtykkir, at 10% av teim 40%, sum vinnuligi arbeiðsmarknaðurin sparir í lækkaðum lønarútgjaldingum, verða løgd í ein grunn, sum verður brúktur til at gjalda føroyska sethúsaskuld niður við. Hetta grunnsgjald verður minkað við 1/10 árliga.

Viðmerkingar

Arbeiðsbólkurin (sonevnda Kjartan L. Kristiansens nevndin), sum síðsta vár alment legði fram álit føroyska búskapinum til bjargingar, vísti á, at um hetta 10% grunnsgjald verður sett í verk, gevur tað um 250 mió. kr. árliga. Hesi 10% kunnu minkast við t.d. 1/10 parti árliga, so vinnulívið eftir 10 árum aftur stendur javnbjóðis tí almenna í lønarútreiðslum, samstundis sum allir sethúsaeigarar verða tilsvarandi betur fyri í sama tíðarskeiði.

Í minnilutaáliti til løgtingsfíggjarlóg 94 hevði fólkaflokkurin líknandi uppskot til samtyktar (sum varð felt). Eitt árligt 250 mió. kr. fkast kundi lætt væl um hjá teim ungu eigarunum av teim nýggjastu og dýrastu sethúsunum. 250 mió. kr. árliga er nógv størri upphædd enn tær 160 mió. kr., ið peningastovnarnir nú hava lækkað rentustøðið.

Saman við tí í minsta lagi 1.3 mia. kr. kontantu skuldaravskrivingini alt fyri eitt, sum fólkaflokkurin nú hevur skotið upp í øðrum tingmáli, høvdu hesar 250 mió. kr. mánað líka so væl, sum allur tann árligi rentufrádráttsrin nú ger.

Skotið verður upp, at hesin grunnur verður brúktur til at gjalda sethúsamassan niður við eftir teim reglum, sum fólkaflokkurin skeyt upp til fíggjarlógina.

At tey nýggjastu sethúsini fáa mesta ískoyti av hesi felags niðurgjaldsskipan er rímiligt, tá ein hevur í huga, at hesi sethús hækkaðu almikið í prísi av ovurupphitingini í búskapinum í 80 árunum, tá arbeiðsmegin treyt og var dýr. Tey ættarlið, sum bygdu í 50-, 60-, 70- og fyrra helming av 80-árunum, fingu "hjálp" frá samfelagsgongdini til at gjalda teirra hús niður. Tá vr nevniliga inflatión við stórari lønarhækkan, sum gjørdi tað lættari at rinda føst lán aftur við. Tá ættarliðið av sethúsaeigarum, sum bygdi seinna helming av 80-árunum og í 90-árunum, skuldi til at rinda síni húsalán aftur, fingur tey ikki "stuðul" frá inflatiónini. Tvørturímóti fullu inntøkur, arbeiðsloysið øktist, og skattatrýstið vaks.

Samanumtikið:
Hesi uppskot til samtyktar o.t. lógaruppskot, sum linka skattatrýstið og kostnaðarstøðið í øllum búskapinum, eru einasta bjarging fyri hetta samfelag. Hin leiðin, harðnandi skattatrýst, hækkandi lønir og framleiðslukostnaður, sum gingin er at enda, serliga av hesum sosialistiska landsstýri, førir bert til undirgang. Øll prógv eru fyri tí.

Lækkandi kostnaðarstøði hevði m.a. ført til, at
Almennu útreiðslurnar minka.
Vinnan á sjógvi og landi fær aftur avlop í raksturin.
Virkini varðveita og enntá økja talið á arbeiðsplássum.
Kappingarførið mótvegis útheiminum batnar.
Føroyskar vørur og tænastur verða bíligari heima sum úti.
Vit fáa betri ráð at góðska fiskavørurnar.
Útflutningurin fær meir virði, lutvalsliga (tí søluprísurin uttanlands "hækkar" í mun til prís- og lønarlag her) og totalt (við hægri marknaðarprísi fyri meir góðskaðar vørur).
Fiskiskipini verða bíligari í rakstri og hava ikki tørv á stuðli til at royna nýggjar leiðir.
Meira fiskur kemur upp á land.
Fiskavirkini fáa betri rakstur (serliga tá tey eru seld úr "Monopolinum").
Svart arbeiði loysir seg minni væl (eftir at skattatrýstið, MVG á arbeiðsløn, er linkað).
Fleiri fólk koma upp aftur í búskapin og forvinna skattskylduga inntøku í staðin fyri at fáa pening afturfyri at halda seg burtur frá arbeiði.
Skattagrundarlagið verður breiðari.
Trýstið á almannaverkið linkar.
Landskassin fær meir inntøku og minni útreiðslur.

1. viðgerð 17. februar 1994. Málið var beint í skattanevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 18. januar 1994 og eftir 1. viðgerð 17. februar 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Lasse Klein, Jacob Lindenskov, Heini O. Heinesen og Finnbogi Arge) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Ein minniluti (Jógvan Sundstein) mælir løgtinginum til at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

2. viðgerð 22. apríl 1994. Uppskotini til samtyktar I, II og III fullu øll við 5-0 atkvøðum.

79 Skipan um loyvi at binda upp í samstarvsavtalur millum vinnufyritøkur úr Føroyum og Rnsslandi/Baltisku londunum eyka kvotur av svartkjafti í føroyskum sjógvi

Ár 1994, tvsdagin 18. januar legði løgmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið niðanfyri nevndu skipan.

Skipanin ber í sær, at loyvt skal verða at binda upp til 40.000 tons av svartkjafti sum eyka kvotur í føroyskum sjógvi upp í samstarvsavtalur millum vinnufyritøkur úr Føroyum og Russlandi/ Baltisku londunum. Til hesa eyka kvotu kunnu 8 skip afturat fáa fiskiloyvi undir Føroyum. Landsstýrið skal góðkenna samstarvs-avtalurnar við tí fyri eyga, at støðið undir almennu avtalunum við Russland og Baltisku londunum viðvíkjandi býti av fiski ikki verður tikið undan.

Viðmerkingar

Í fiskivinnusáttmálunum við Russland og Baltisku londini er ásett, at partarnir skulu virka fyri samstarvi millum vinnufyritøkur í Føroyum og Russlandi/Baltisku londunum.

Víst verður til grein VIII í váttaðu frásøgnini frá 17. fundi í føroysku-russisku felagsnevndini um sínámillum fiskivinnumál, undirritað í Kirkjubø 3. desember 1993. Víst verður somuleiðis til fundarsemjurnar frá samráðingunum við Estland, Lettland og Litavia í Keypmannahavn 15., 16. og 17. november 1993.

Í sambandi við hetta er yuski um, at skip úr hesum londum kunnu fáa eyka kvotur av svartkjafti í føroyskum fiskiøki, og at loyvt verður at binda upp í samstarvsavtalur millum vinnufyritøkur úr Føroyum og Russlandi/Baltisku londunum eyka kvotur av svartkjafti í føroyskum sjógvi.

1. viðgerð 21. januar 1994. Málið varð beint í marknaðarnevndin, sum 17. februar 1994 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. januar 1994 og eftir 1. viðgerð 21. januar 1994 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og er **nevndin samd** um at mæla løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 22. februar 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

FL jnr. 1555-2/90.

80 Ígildissetan fyri Føroyar av Baselsáttmálanum um eftirlit við flutningi av vandamiklum burturkasti um landamark

Ár 1994, týsdagin 18. januar legði Signar á Brúnni, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtykt

Løgtingið viðmælir, at Føroyar taka undir við danskari ratifikatión av Basel-sáttmálanum um eftirlit við flutningi av vandamiklum burturkasti um landamark, sum Danmark undirskrivaði á ráðstevnu í Basel tann 22. mars 1989, og at heimila landsstýrinum at gera nærri avtalu við danskar myndugleikar um, hvussu Føroyar í praksis skulu luttaka í samarbeiðinum.

Viðmerkingar:
Basel-sáttmálin varð undirskrivaður av Danmark 22. mars 1989 á ráðstevnu í Basel, har 116 lond luttóku. Danmark tók fyrivarni viðvíkjandi Føroyum og Grønlandi, men Grønland hevur í 1990 góðkent, at fyrivarnið dettur burtur. Sáttmálin kom í gildi tann 5. mai 1992 samsvarandi art. 25 í sáttmálanum, sum ásetir, at sáttmálin fær gildi 90 dagar eftir, at hann er ratifiseraður av 20 londum. Í apríl 1993 høvdu 43 lond ratifiserað sáttmálan, herundir Finnland, Svøriki og Noreg.

Danmark ætlar at ratifisera sáttmálan tann 6. februar í ár, og heitir Ríkisumboðið tí á føroyskar myndugleikar um at fráboða sína støðutakan innan hetta tíðspunkt.

Sáttmálin ásetir í art. 4 tær meginreglur, sum sáttmálapartarnir binda seg til at halda.

Her kann nevnast.

at minka um framleiðsluna av vandamiklum burturkasti (stk. 2, litra a),
at vandamikið burturkast verður handfarið umhvørvisliga forsvarliga (stk. 2, litra b og c),
at flutningur um landamark av vandamiklum burturkasti verður minkaður sum mest (stk. 2, litra d),
at forðað verður fyri útflutningi og innflutningi av vandamiklum burturkasti, um vandi er fyri, at burturkastið ikki verður handfarið umhvørvisliga forsvarliga í innflytaralandinum (stk. 2, litra e og g).
at bannað verður øðrum enn løggildum ella góðkendum persónum at flyta ella beina fyri vandamiklum burturkasti (stk. 7, litra a).
at krav verður at vandamikið burturkast, sum fer um landamark, hevur serligt frámerki (stk. 7, litra b), og
at útflutningur av vandamiklum burturkasti bert skal verða loyvdur, um útflytaralandið ikki hevur neyðugu tekniska útgerð til fyribeining av burturkastinum, ella um burturkastið er neyðugt sum rávøra í endurnýtslufyritøkum í innflytaralandinum (stk. 9).

Serligan áhuga hevur art. 4, stk. 5, sum áseur, at partarnir ikki mugu loyva innflutningi frá ella útflutningi til eitt land, sum ikki er partur í sáttmálanum. Loyvt er tó sáttmálaparti at gera avtalu við triðjaland, men avtalan má áseta treytir um handfaring av vandamiklum burturkasti, sum í minsta lagi eru eins strangar, sum treytirnar í sáttmálanum (art. 11). Føroyar mugu sostatt anun rattifisera ella gera serskilda avtalu við Danmark, um tað framvegis skal vera møguligt at senda vandamikið burturkast til fyribeiningar í Danmark.

Art. 6 og 7 snúgva seg um mannagongd í førum, tá vandamikið burturkast skal flytast um landamark, t.d. reglur um fráboðanarskyldu, samtykki frá innflytaralandinum, og prógv fyri at burturkastið verður forsvarliga fyribeint í innflytaralandinum.

Partarnir binda seg til at laga lóggávu og fyrisitingarligar reglur soleiðis, at ásetingarnar í sáttmálanum vera hildnar uppi (art. 4, stk. 4 og art. 9, stk. 5). Einki er tó í vegin fyri, at partarnir hvør í sínum lagi gera reglur, sum eru strangari enn ásetingarnar í sáttmálanum (art. 4, stk. 11), og stendur tað pørtunum frítt fyri heilt at banna innflutningi av vandamiklum burturkasti (pkt. 6 í præamblinum og art. 4, stk. 1, litra a). Danmark hevur fyri sítt viðkomandi tillagað sínar reglur við "bekendtgørelse om grænseoverskridende transport af farligt affald", og mugu samsvarandi føroyskar reglur gerast, um ásetingarnar í sátmálanum skulu haldast.

Sáttmálin hevur eisini reglur um samstarv innan umskifti av upplýsingum millum partarnar, menning av nýggjari meira umhvørvisvinarligari tøknifrøði, útbúgving, v.m.

At enda eru eisini reglur um stovnan av partaráðstevnu, har partarnir regluliga skulu hittast, stovnsetan av skrivstovu, mannagongd um sáttmálin skal broytast, trætuloysn, gildiskomu, v.m.

Sáttmálin hevur verið til ummælis hjá Heilsifrøðiligu Starvstovu og hjá Arbeiðseftirlitinum, og viðmæla báðir stovnar, at fyrivarnið viðvíkjandi Føroyum dettur burtur.

Sáttmálin verður lagdur við í danskari týðing. Gjørt verður vart við, at týðingin ikki hevur alment gildi, eftirsum sáttmálin sambært art. 29 í sáttmálanum ikki er undirskrivaður í donskum líki.

Mælt verður til at góðkenna, at fyrivarnið viðvíkjandi Føroyum deilir burtur. Føroyar luttaka ikki sum sjálvstøðugur partur í sáttmálanum, men bert sum partur av danska kongaríkinum. Mælt verður tí somuleiðis til at heimila landsstýrinum at gera nærri avtalu við danskar myndugleikar, um hvussu Føroyar í praksis skulu luttaka í samarbeiðnum, herundir hvussu útreiðslurnar, sum standast av hesum, skulu býtast.

1. viðgerð 25. januar 1994. Málið varð beint í umhvørvisnevndina, sum 26. januar 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. januar 1994 og eftir 1. viðgerð 25. januar 1994 beint í umhvørvisnevndina.

Málið snýr seg um at ratifisera Basel-sáttmálan, sum snýr seg um eftirlit við flutningi av vandamiklum burturkasti um landamørk.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fund við Signar á Brúnni, landsstýrismann í umhvørvismálum og avvarandi landsstýrisfulltrúa, har nevndin m.a. hevur fingið upplýst, at hetta fer ikki at føra til stórvegis meirútreiðslur fyri landskassan.

Nevndin ásannar, at Føroyar mugu antin ratifisera sáttmálan ella gera serskilda avtalu við Danmark, um tað framvegis skal vera møguligt at senda vandamikið burturkast til fyribeiningar í Danmark. Eitt samd nevnd tekur tí undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 1. februar 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

FL jnr. 2750-19/92.

81 Broyting í løgtingslóg um striking av skuld hjá Interkommunala Renovatiónsfelagsskapinum

Ár 1994, týsdagin 18. januar legði Signar á Brúnni, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um striking av skuld hjá Interkommunala Renovatiónsfelagsskapinum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 89 frá 6. mai 1993 um striking av skuld hjá Interkommunala Renovatiónsfelagsskapinum verður gjørd henda broyting:

§ 1, stk. 2 verður orðað soleiðis:

"**Stk. 2.** Strikingin er treytað av, at IRF ger eina rakstrarætlan, sum landsstýrið kann góðkenna, og fremur neyðug tiltøk, so at rakstrarætlanin kann halda."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om eftergivelse af det Interkommunale Renovationsfællesskabs gæld.

§ 1.

I lagtingslov nr. 89 af 6. maj 1993 om eftergivelse af det Interkommunale Renovationsfællesskabs gæld foretages følgende ændring:

§ 1, stk. 2 affattes således:

"**Stk. 2.** Eftergivelsen er betinget af, at IRF gør en driftsplan, som landsstyret kan godkende, og gør nødvendige foranstaltninger for at driftsplanen kan holde."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Eftir § 2, stk. 2 í lógini er strikingin av skuldini treytað av, at IRF fremur tiltøk, sum gera, at javnvág verður í rakstrinum.

Av viðmerkingunum hjá landsstýrinum til lógaruppskotið gongur fram, at henda treyt skal skiljast soleiðis, at raksturin hjá IRF skal leggjast soleiðis til rættis, at IRF sjálvt verður ført fyri at røkja sínar skyldur mótvegis lángevarunum, men at landsstýrið, hóast hesa treyt, kann leggja út í 1993, 1994, 1995 og 1996 fyri hollendska lánið hjá IRF. Hesi landskassaútlegg verða, sambært viðmerkingunum til lógina, afturrindað landskassanum.

Áðrenn skuldin hjá IRF uppá 33 mió. kr. varð strikað úr landskassaroknskapinum, var neyðugt at leggja 60 mió. kr. út fyri lán til IRF frá Westdeutche Landesbank, tí tað var ikki møguligt at fáa lánið endurnýggjað.

Skuldin hjá IRF til landskassan er, umframt tær 33 mió. kr., umleið 63 mió. kr.

Skal skuldin rindast landskassanum aftur eftir vanligum treytum, fæst ikki javnvág í raksturin hjá IRF uttan so, at gjøldini frá kommununum og brúkarunum beinanvegin verða hækkað heilt

munandi. Landsstýrið metir hetta ikki vera ráðiligt.

Í staðin hevur landsstýrið skotið upp fyri IRF, at teir sjálvir rinda lánsgjøldini til hollendska lángevaran, og at afturgjaldingin av landskassaútleggum, sum fyri tað mesta viðvíkur útleggi fyri lánið frá Westdeutche Landesbank, síðani verður tillagað eini rakstrarætlan, sum landsstýrið kann góðkenna, har gjøldini til IRF frá kommununum og brúkarunum verða ásett, sum víst í viðløgdu rakstrarætlan.

Afturgjaldsskipanin er tillagað soleiðis, at allar rakstrar- og kapitalútreiðslur hjá IRF, ekskl. gjøldini til landskassan, verða rindaðar, áðrenn landskassin tær nakað. Við teimum sambært rakstrarætlanini ásettu kommunu- og brúkaragjøldum merkir hetta, at gjøldini til landskassan verða sum víst í hjáløgdu afturgjaldsskipan.

Av tí at tað kann vera ivasamt, um treytirnar, sum settar vórðu fyri at strika 33 mió. kr., eftir hesum eru loknar, hóast IRF nú sjálvt skal rinda lánsgjøldini til hollendska lángevaran, verður mett, at rættast er at leggja málið aftur fyri løgtingið. Skotið verður upp, at treytirnar í § 1, stk. 2 verða broyttar soleiðis, at strikingin verður treytað av, at gjørd verður ein rakstrarætlan samsvarandi viðløgdu ætlan, sum landsstýrið kann góðkenna, og at avvarðandi myndugleikar hjá IRF taka neyðugar avgerðir í hesum sambandi.

1. viðgerð 20. januar 1994. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 17. januar 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. januar 1994 og eftir 1. viðgerð 20. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hava Signar á Brúnni, landsstýrismaður í kommunumálum, og tveir fulltrúar í landsstýrinum verið á fundi í fíggjarnevndini og kunnað nevndina nærri um málið.

Upplýst var fyri fíggjarnevndini, at brennigjaldið til IRF verður kr. 960 fyri hvønn íbúgva í staðin fyri, sum skotið upp áður, kr. 1.000,- og at brúkaragjøldini ikki verða hækkað.

Við hesum gjaldi, teim rentum og avdráttartreytum, sum landsstýrið hevur ásett, verður neyðuga javnvágin í rakstrinum hjá IRF.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 22. februar 1994. Uppskotið samtykt við 22-0 atkvøðum.

3. viðgerð 25. februar 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

FL jnr. 838-1/90.

82 Skattafrí heiðursgáva

Ár 1994, týsdagin 18. januar legði Niels Pauli Danielsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at kanna møguleikarnar fyri at veita øllum teimum, sum sigldu undir krígnum, og hjúnafeløgum teirra eina lívslanga skattafría heiðursgávu úr landskassanum, sum eisini skal kunna veitast øðrum, sum á ein serligan hátt hava sett lív sítt í váða fyri at hjarga.

Viðmerkingar

Hin 21. februar 1990 legði undirritaði fram á ting vegna kristiliga fólkaflokkin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk uppskot um krígspensión. Uppskotið varð eftir 1. viðgerð hin 6. mars beint í almanna- og heilsunevnd løgtingsins.

Síðan er tað hent, at danska lógin um "erstatning til besættelsestidens ofre" eftir áheitan frá privatum persónum og feløgum er fingin at galda fyri teir, sum sigldu við føroyskum skipum. Í 1993 eru soleiðis útgoldnar út við 70 mió. kr. í krígspensión, sum lands- og kommunukassarnir fáa sín stóra part av í álíknaðum skatti.

Stórt tal av føroyingum tók á seg tað vandafulla starv at sigla við fiski á bretska marknaðin undir krígnum, og sjálvur Churchill skal hava havt tað á orði í bretska undirhúsinum, at hetta ongantíð skuldi verða gloymt føroyingum.

Henda sigling útvegaði landi okkara stóran ágóða, sum varð við til at endurreisa hin føroyska flotan og menna landið eftir krígslok á sama hátt, sum krígspensjónin úr Danmørk nú fyri ein stóran part fer til teir tómu kassarnar hjá landi og kommunum.

Tað er tí ikki annað enn rímiligt, at hitt almenna veitir øllum teimum eins sømdargávu, sum sigldu undir krígnum, sum tøkk fyri tað, teir vunnu Føroyum, og tað, nógvir teirra í dag við skattaðu krígspensiónini úr Danmørk hava útvegað tí almenna.

Henda heiðursgáva eigur at verða útgoldin øllum teimum, ið sigldu, so at eisini teir fáa hana, sum ikki hava nóg mikið av siglingstíð til at fáa krígspensión, og teir, sum einki mein fingu av siglingini. Tað eigur eisini at galda fyri hjúnafelagan, so at eisini tær einkjur fáa, ið mistu mannin.

Heiðursgávan eigur at vera lívslong og skattafrí á sama hátt, sum heiðursgávan frá danska ríkinum upp á 5.800 kr. er tað, ið veitt verður umframt krígspensjónina frá "Arbejdsskadestyrelsen", og skal hon eisini kunna veitast øðrum, sum hava sett lív sítt í váða fyri at

bjarga fólki.

1. viðgerð 8. februar 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 27. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 18. januar 1994 og eftir 1. viðgerð 8. februar 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og vísir til løgtingsmál nr. 65/1993: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. Nevndin setir tí eini uppskot fram.

2. viðgerð 28. apríl 1994. Uppskotið fall við 1-0 atkvøðu.

83 Broyting í løgtingslóg um húsalánsgrunn

Ár 1994, hósdagin 20. januar legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

<u>løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um húsalánsgrunn</u>.

<u>§ 1.</u>

Í løgtingslóg nr. 97 frá 1. november 1978 um húsalánsgrunn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 32 frá 7. mai 1991, verður gjørd hesa broyting:

Í § 12 verða sum stk. 2 og stk. 3 sett:

"**Stk. 2.** Í serligum førum kann stýrið víkja frá ásetingini um afturgjaldstíð. Somuleiðis kann stýrið í serligum førum útseta afturgjalding av lánum uttan rentutilskriving fyri útsetingartíðarskeiðið.

Stk. 3. Treytin fyri at nýta tær í stk. 2 nevndu ásetingarnar er, at longda afturgjaldstíðin ikki fer upp um 30 ár.

<u>lagtingslov om ændring i lagtingslov om boliglånefond</u>.

<u>§ 1.</u>

I lagtingslov nr. 97 af 1. november 1978 om boliglånefond, som senest ændret ved lagtingslov nr. 32 af 7. maj 1991, foretages følgende ændring:

I § 12 indsættes som stk. 2 og stk. 3:

"**Stk. 2.** Bestyrelsen kan i særlige tilfælde fravige fastsættelsen af tilbagebetalingstiden. Endvidere kan bestyrelsen i særlige tilfælde udsætte tilbagebetaling af lån uden rentetilskrivning i udsættelsesperioden.

Stk. 3. Betingelsen for at anvende de i stk. 2 nævnte bestemmelser er, at den for-

gjaldstíðin ella útsetingin av afturgjalding av lánum eru liður í eini felagsloysn saman við øðrum lánveitarum í ognini og at mett verður, at lántakarin við avtaluni um eina felagsloysn í framtíðini verður førur fyri at uppfylla skyldur sínar mótvegis lánveitarunum."

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1994.

længede tilbagebetalingstid eller udsættelse af tilbagebataling af lån, er et led i en fællesløsning udarbejdet i samråd med andre långivere i ejendommen og at det skønnes, at låntageren ved aftalen om en fællesløsning for fremtiden, bliver i stand til at opfylde sine forpligtelser mod långiverne."

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1994.

Viðmerkingar:

Húsalánsgrunnurin hevur eftir áheitan frá landsstýrinum arbeitt við at fáa í lag eina skipan, sum kann gera tað møguligt hjá sethúsacigarum at sita í húsum sínum og sostatt í størsta mun fyribyrgja eini tvingsilssølu. Í hesum sambandi hevur leiðsla grunsins samráðst við peningastovnarnar um skipanir við felagsloysnum. Hetta arbeiði er nærum liðugt og er útlánsrentan hjá peningastovnunum til sethús lækkað frá 1. januar 1994 at rokna. Somuleiðis er møguleiki hjá sethúsacigarum at fáa afturgjaldstíðina longda.

Hetta krevur tí cisini, at Húsalánsgrunnurin kann víkja frá ásetingini um afturgjaldstíð og rentu.

Eftir galdandi lóg hevur Húsalánsgrunnurin ikki møguleika at leingja afturgjaldstíðina av lánum út yvir 28 ár. Skotið verður tí upp, at stýrið sum liður í eini felagsloysn í serligum førum fær møguleika at leingja afturgjaldstíðina. Somuleiðis verður skotið upp, at stýrið í serligum førum kann útseta afturgjaldingina av lánum uttan rentutilskriving fyri útsetingarskeiðið. Reglurnar kunnu bert nýtast í serligum førum sum liður í eini felagsloysn saman við øðrum lánveitarum í ognini og at mett verður, at lántakarin í framtíðini verður førur fyri at uppfylla skyldur sínar mótvegis lánveitarunum. Við lánveitarar í hesum ásetingum skilst teir lánveitarar, sum hava veitt lán beinleiðis til ognina í eini av Húsalánsgrunninum góðkendari veðseting, og ikki kreditorar, sum hava gjørt úttøku í ognini ella kautiónir v.m.

1. viðgerð 25. januar 1994. Málið vurð beint í fíggjarnevndina, sum 18. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 20. januar 1994 og eftir 1. viðgerð 25. januar 1994 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, Jákup Nielsen, landsstýrisfulltrúa, og Jóannes Dalsgarð, stjóra fyri Húsalánsgrunnin.

Landsstýrismaðurin greiddi frá, at Húsalánsgrunnurin hevur havt samráðingar við

peningastovnarnar um skipanir við felags loysnum. Sum er kann Húsalánsgrunnurin ikki longja afturgjaldstíðina av lánum út yvir 28 ár og fyriliggjandi uppskot gongur út upp á, at stýrið sum lið í eini felagsloysn í serligum førum kann longja um afturgjaldstíðina. Eisini sum liður í eini felags loysn verður biðið um heimild til at útseta afturgjaldingina av lánum uttan rentutilskriving fyri útsetingarskeiðið.

Ein samd fíggjarnevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 22. mars 1994. Uppskotið samtykt við 29-0 atkvøðum.

3. viðgerð 24. mars 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

Lóg nr. 45 frá 8. apríl 1994.

84 Frásøla av flakavirkjunum hjá p/f Føroya Fiskavirking til sunna kapping hvørt við annað

Ár 1994, hósdagin 20. januar løgdu Svend Auge Ellefsen og John Petersen, løgtingsmenn, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at landsstýrið skal áleggja almennum stovnum og grunnum, ið eiga partapening í p/f Føroya Fiskavirking, at hesir skulu virka fyri, at flakavirkini hjá partafelagnum verða boðin út til sølu.

Viðmerkingar

Nú er skjótt eitt ár farið, síðani formaðurin fyri Fíggingargrunninum frá 1992 hin 25. mars boðaði tásitandi landsstýri frá teimum ætlanum, sum grunnurin hevði, at øll føroysku flakavirkini skuldu leggjast saman í eitt monopolpartafelag, og flestu av teimum skuldu steingjast ella "leggjast í mølposa", sum málburðurin var.

Hóast løgmaður í skrivi til forsætismálaráðharran 30. mars í fjør gjørdi greitt, at landsstýrið ikki vildi góðtaka nýggju ætlanirnar og vísti á, at ætlanirnar beinleiðis gingu ímóti semjunum,

sum landsstýrið og stjórnin frammanundan høvdu gjørt, so broyttist kortini støðan hjá Føroya landsstýri, tá Javnaðarflokkurin boðaði frá, at flokkurin tók undir við monopoliseringsætlanini.

Orsakað av monopolætlanunum býtti løgtingið seg sostatt av nýggjum í tvinnar partar. Fólkaflokkurin, sum var hart ímóti ætlanini noyddist úr Tinganesi og í andstøðu, meðan Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, sum tóku undir, skipaðu nýtt landsstýri saman við Javnaðarflokkinum.

Hesin nýggi meirilutin hevur síðan m.a. í sambandi við semjur við ríkisstjórnina tikið undir við skipan av føroysku flakavinnuni í p/f Føroya Fiskavirking.

Tíbetri eydnaðist ikki fullkomiliga at monopolisera flakavinnuna, tá tað eina danska fíggingarfelagið valdi at ganga ímóti og av sínum eintingum sanera flakavirkini á Kósini í Klaksvík og í Hvalba.

Nógvar vóru grundirnar fyri, at fólkaflokkurin setti landsstýrisluttøkuna og hervið politisku ávirkanina upp á kant í eini roynd at savna meiriluta á løgtingi ímóti harraboðunum um bygnaðarbroytingina.

Týðiligari gerst tað eisini fyri hvønn dag, sum gongur, at umskipanin av cigaraviðurskiftunum, so tey mest gjørdust lík teimum eystan jarntjaldið, áðrenn múrurin fall, gjørdist størsta vanlukkan hesum samfelagnum hevur verið fyri í nýggjari tíð, ein vanlukka, sum fullkomiliga forðar framvøkstri av nýggjum skilagóðum framtøkum innan høvuðsvinnugreinina í landinum.

Úrslitið higartil er ógvusligt.

1. Bert 7-8 virkir eru opin, og eini 10-12 stongd og løgd í mølposan!

2. Fleiri hundrað arbeiðspláss færri eru í flakavinnuni enn frammanundan. T.d. kann vísast á, at áðrenn monopoliseringina vóru yvir tvey hundrað fólk til arbeiðis ávikavist í Vágum og á Sandoynni, nú starvast 55 fólk í Miðvági, eingin í Sørvági, eingin í Skopun og eingin heima á Sandi!

Samgonguflokkarnir hava soleiðis medvirkað til, at tey 15-20 prosentini av samlaðu rávørunøgdini, sum vanliga vóru landað og framleidd á hesum oyggjum, nú eru flutt aðrastaðni. Á Sandoynni og Vágum er tí metstórt vinnuloysi. Sami standurin er í nógvum øðrum bygdum, ið raktar eru.

3. Eyðsýnt er, hvønn týdning missurin fær á fíggjarliga umfarið og fíggjarligu støðuna í teimum kommununum, sum raktar eru. Lækkaða sethúsavirðið í hesum bygdum veksur munandi um neyðina bæði við atliti til viðurskifti hins einstaka og ikki minni til solvensviðurskifti peningastovnanna.

4. Skuldin upp á 300-400 mió. kr., sum tey 7-8 virkini, ið opin eru, nu skulu ferrena, gevur størri miðalskuld pr. virki enn frammanundan saneringini, og fíggjarliga úrslitið verður ivaleyst hareftir!

5. Miðsavningin av rávøruni á fáum økjum í landinum økir munandi um ónøgdina millum fólk og breiðir vónloysi eisini til annað virksemi. Ørkymlanin úti á oyggjunum hevur fingið einstaklingar, fakfeløg, bygdarráð og almenn umboð at mótmælt, men ikki kann sigast, at úrslitið sæst eftir.

6. Stóra skuldin og m.a. stóru flutningsútreiðslurnar av fiski til sokallaðar serframleiðslur suður-, eystur-, vestur- og norðureftir trýsta landingarprísirnar niður. Annars var óført reyp frammanundan, at fiskaprísirnir skuldu hækka.

7. Sera vánaligt tekin er eisini, at fleiri av frægastu leiðarunum hjá almenna framleiðslupartafelagnum hava sagt seg úr starvi hjá monopolinum.

8. Í teimum bygdum, har flakavirkið er stongt, missir útróðurin flestu av teimum tænastum, sum útróðurin hevur fyri neyðini, um honum skal verða lív lagað. Við flakavirkinum fer solciðis agngoymslan og agnsølan, har fer skipað mótøka av fiski, tá komið verður at landi, har fer havnalossikrani o.s.fr.

9. Greitt er tí, at tá nýggja samgongan, tá hon samdist við ríkisstjórnina um stovnan av monopolfelagnum, samstundis segði deyðadómin yvir útróðurin í fleiri av frægastu útróðrarbygdum okkara. Nógvar av hesum bygdum høvdu einans fiskivinnuna at liva av!

Hóast móðurfelagið í fleiri førum hevur fingið tilboð um leigu ella keyp av stongdu virkjunum, hevur felagið higartil sagt kortanei. Felagsins ætlan er sostatt framvegis at royna at útvega sær eina monopolstøðu!

Í desperatión yvir syndarligu støðuna í nærumhvørvinum hava frægir borgarar nógva staðni tí útvegað sær høli í kjallarum, í gomlum pakkhúsum, í bilskúrum o.s.fr. at arbeiða fisk í, meðan virkisbygningar, sum standa avvarðandi kommunum í tíggjutals milliónum, standa kaldir og tómir, gnagaðir av tíðarinnar tonn. Nógva staðni síggjast lastbilar dagliga koma til stongdu virkini eftir rakstrargøgnum at nýta aðrastaðni. Dømi eru um, eitt nú í Sørvági, at borgarar royna at taka seg saman at byggja nýggjan virkisbygning við síðuna av stongda virkinum, fyri at útvega virkismøguleikar í heimbygdini! At eitt partafelag, sum í høvuðsheitum er ogn hins almenna, skal medvirka til slíkan ørvitisskap er burturvið!

Tað má nú vera komið hartil, at sjálvt tey, sum í síni tíð góðtóku móðurfelagið, hava fingið eyguni opnað og skilja, at henda leiðin bert ber skeivan veg.

Skotið verður tí upp, at farið verður undir at selja virkir frá móðurfelagnum heinanavegin.

Ein háttur at gera hetta upp á er sjálvsagt at byrja við teimum virkjum, sum standa stongd frammanundan, so tær bygdir, ið vara av stongdu virkjunum aftur kunnu vekjast upp til dáð!

Partaeigarar í móðurfelagnum eru m.o. Tryggingarsambandið, Fíggingargrunnurin frá 1992 og báðir bankarnir - alt ogn hjá tí almenna.

Tað skuldi tí verið lagamanni hjá landsstýrinum alt í einum uppskoti er samtykt, at taka upp samrøður við partaeigararnar, so áleggjast kann teimum at medvirka til frásøluna.

Nógv verður í hesum tíðum sagt og skrivað um kappingarføri.

Í tí sambandinum verður víst til uppskot fólkafloksins kappingarførinum viðvíkjandi, t.d. í álitinum til løgtingsfíggjarlógina fyri 1994.

At alneyðugt er at lækka skattatrýstið, lønarlagið og kostnaðarstøðið fyri at bøta upp á føroyska kappingarførið, munnu flest allir føroyingar vita uttan tey, sum umboða størru samgonguflokkarnar á tingi og í landsstýri. Eisini er neyðugt at royna at bøta um handilsavtalurnar millum Føroyar og útheimin.

Kortini stendur fast, at ein vinnulívsbygnaður, sum ber kapping við sær, er fremsta treytin fyri at kunna brúka eitt betri kappingarføri til stórvegis framstig.

Sostatt er ongantíð ov skjótt at fáa avtikið móðurfelagið og fáa selt flakavirkini til einstaklingar ella partafeløg, sum fara í sunna kapping hvørt við annað.

1. viðgerð 26. januar 1994. Málið varð beint í Iðnaðarnevndina, sum 26. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 20. januar 1994 og eftir 1. viðgerð tann 26. januar 1994 beint í Iðnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Heini O. Heinesen. Jacob Lindenskov og Karl Heri Joensen) setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Olaf Olsen) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot fólkafloksins.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen) førir fram. Tá mai avtalan millum Føroya Landsstýri og ríkisstjórnina var til viðgerðar í løgtinginum, har m.a. uppskot um samanlegging av føroysku flakavirkjunum var eitt av evnunum, mótmælti minnilutin (Flemming Mikkelsen) við at seta fram uppskot til samtyktar um ikki at taka undir við nevndu samanlegging (Tingmál nr. 207/92). Uppskotið fall. Okkara demokratiska skipan er so háttað, at meirilutaavgerðin verður galdandi. Orðatakið sigur, at fær man ikki tað besta, verður ein noyddur at taka við tí næstbesta, um ein ætlar sær at vera við. P/F Føroya Fiskavirking er ein veruleiki. Minnilutin Flemming Mikkelsen) heldur, at hesin felagsskapur eigur at fáa ein kjans at royna seg, og kann tí ikki taka undir við uppskotinum til samtyktar.

2. viðgerð 27. apríl 1994. Uppskotið fall við 12-0 atkvøðum.

85 Løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald v.m. (162/92)

Ár 1993, týsdagin 25. januar legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 24. mars 1993 og eftir 1. viðgerð 29. mars 1993 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið saman við løgtingsmáli nr. 174/92: Løgtingslóg um løgtingsgrannskoðarar, løgtingsmáli nr. 175/92: Løgtingslóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum v.m. og saman við løgtingsmáli nr. 176/92: Reglugerð um val og virki løgtingsgrannskoðaranna.

Tann 5. mai 1993 legði nevndin fram sítt fyribils tolagsálit í hesum fýra málum. Í fyribilsálitinum vísti fíggjarnevndin á, at málini eru sera umfatandi, og at tíðin var ógvuliga knapp at fáa málini avgreidd í ti tingsetum. Nevndin mælti tí til, at hon sum millumtinganevnd arbeiddi viðari við málunum, soleiðis at endaligt álit kundi leggjast fram í hesi tingsetuni. Hetta varð samtykt eftir 2. viðgerð tann 10. mai 1993.

Eftir uppskotunum frá landsstýrinum skuldu allar hesar lógirnar eins og reglugerðin um val og virki løgtingsgrannskoðaranna, koma í gildi frá 1. januar 1994. Ætlanin hjá fíggjarnevndini var tí at skriva eitt felagsálit í hesum fýra málum, men nú hava løgtingsgrannskoðararnir mælt til, at ígildissetingin av lóg um løgtingsgrannskoðarar, lóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum v.m. og ígildissetingin av reglugerðini um val og virki løgtingsgrannskoðaranna, verður útsett til 1. januar 1995.

Undir viðgerðini hevur fíggjarnevndin hildið fund við Jógvan Sundstein, sum var landsstýrismaður í fíggjarmálum, tá málið varð framlagt. Nevndin hevur eisini hildið fund við Finnboga Isakson, núverandi landsstýrismann í fíggjarmálum. Somuleiðis hevur fíggjarnevndin hildið fund við Mantu Petersen, løgmann, Leiv Harryson, landsgrannskoðara, Leif Abrahamsen, stjóra á Føroya Gjaldstovu, Kára Petersen, stjóra á fíggjar- og búskapardeildini í Tinganesi og við Reidar Nónfjall, feltrúa, sum var limur í roknskaparbólkinum, ið landsstýrið setti at arbeiða við hesum máli.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í sín meiriluta og ein minniluta.

Aftan á fundirnar við frammantýrinevndu, er **meirilutin** (Vilhelm Johannesen, Jóhannes Eliefsen, Karl Heri Joensen, Hergeir Nielsen, Flemming Mikkelsen og Anfinn Kallsberg) komin til ta niðurstøðu, at tørvur er á einum skipaðum roknskaparhaldi, hvørs endamál er at skráseta og viðgera roknskapardata til nýtslu í sambandi við fíggjaretlanir, fíggjarstýring og játtanarettirlit. Meirilutin ásannar, at uttan eitt skipað roknskaparhald verður tiggjarløgtingslógin ikki tað búskaparpolitiska amboð, sum eigur at hava størstan týdning, tá tað snýr seg um at stýra og ávirka føroyska búskapin.

Búskaparligu stýringsstrupulleikarnir hjá landsstýrinum og løgtinginum koma serliga til

sjóndar. tá tann avmarkaði peningurin á fíggjarlógini skal hýtast ella ráðlestast. og tá metast skal um. annaðhvørt peningurin verður nyttur á rættan hátt ella ikki. og um peningurin yvirhøvur verður nýttur soleiðis. sum ætlað var. tá fíggjarlógin varð viðgjørd og samtykt. Hesar trupulleikar skulu reglurnar um landsins almenna roknskaparhald verða við til at loysa.

Fyrimunirnir við formligum reglum eru m.a.. at tað verður gjørligt at áseta. hvørjar heimildir, ábyrgdir og skyldur. almennir stovnar hava í sambandi við roknskaparhald landsins. Sum viðurskiftini eru í dag. hava nógvir stovnar einki heinleiðis roknskaparligt tilknýti til fíggjarlógina og landskassaroknskapin. Tað er upplýst fyri fíggjarnevndini. at landsstýrið hevur samtykt at kanna møguleikarnar fyri at stovna eina miðsavnaða og nútíðarhóskandi rokuskapar- og búskaparstýringarskipan. Á fíggjarlógini fyri 1993 fekk landsstýrið 1.000.000.00 kr. til hetta endamál.

Øku uppgávurnar viðvíkjandi almenna roknskaparhaldinum seta stór krøv um grundleggjandi meginreglur fyri. hvussu bygnaðurin við atliti til almenna roknskaparhaldið sum heild skal tyriskipast. hvussu datastreymar. ábyrgd og heimildir skulu formaliserast. hvussu leiklutur gjaldstovunnar skal vera í ti mentu umsitingini. og hvussu edv-skipanir skulu mennast og samskipast. Undir teimum viðurskiftum. sum eru galdandi í dag. kunnu fleiri trupulleikar nevnast. T.d. kann verða nevnt:

1. Vantandi felags kontoskipan.
2. Decentralar roknskaparskipanir og lønarskipanir uttan nilýst tilknyti til gjaldstovuna og landskassaroknskapin.
3. Spjaðing av almennum gjaldføri.
4. Ymisk fíggjarlógarviðgerð fyri almennar stovnar. T.d. skulu nakrir stovnar lata landskassanum yvirskotið. meðan aðrir uttan nakrar ásetingar kunnu gera nýtslu av yvirskotinum.
5. Ógreið uppseting av landskassaroknskapinum.
6. Ivin um. hvørjir stovnar skulu við á fíggjarlógina og í landskassaroknskapin.

Í álitinum til landsstýrið hevur roknskaparbólkurin lagt stóran dent á at lýsa verandi viðurskifti viðvíkjandi landsins almenna roknskaparhaldi v.m. Bólkurin staðfestir, at frá fleiri síðum verður víst á ymiskar trupulleikar, ymiskar spurningar og ymisk viðurskifti. sum tevna um alt. frá hvussu tað almenna roknskaparhaldið skal skipast. og hvussu almennir roknskapir skulu setast upp.

Bólkurin heldur tað ti vera neyðugt. at landsstýrið við lóg ávegar sær heimildir til tess at áseta nærri reglur og krov fyri skipan av roknskaparhaldi hjá tí almenna og um uppsetan av almennum roknskapum og ásetan av ymiskum løgtingsmáli verður hetta gjørt. Talan er um eina rammulóg ella eina heimildarlóg. Samhørt §§ 3 og 5 skal karmurin fyllast út við kunngerðum og reglugerðum.

Meirilutin roknar ikki við. at allir stovnar eru samdir í teimum sjónarmiðum. sum roknskaparbólkurin førir fram og heldur tað ti vera neyðugt. at landsstýrið í sambandi við. at §§ 3 og 5 í lógini verða fyltar út. ráðfører seg við teir stovnar. ið skipanin kemur at tevna um. Í hesum sambandi eigur landsstýrið eisini at taka støðu til leiklut gjaldstovunnar. Ansast má eftir, at lógarkarmurin ikki verður uttylur við ásetingum. sum stovnarnir ikki eru tyrreikaðir at umsita eftir.

Samhært roknskaparbólkinum eiga reglurnar í eini kunngerð samhært § 3 í høvuðsheitum at fevna um hesi viðurskifti:

1. Hvørjar uppgávur roknskaparhald landsins skal loysa.
2. Hvørjar stovnar roknskaparhaldið skal fevna.
3. Hvussu roknskaparhaldið skal verða tyriskipað.
4. Krøv um roknskaparførslu.
5. Krøv um roknskapariframløgu og
6. Arbeiðsgongdir og eftirlit í sambandi við út- og inngjaldsmarr hjá almennum stovnum v.m.

Viðvíkjandi reglugerð, sum skal gerast samhært § 5 í lógini, sigur roknskaparbólkurin, at hendan í høvuðsheitum eigur at fevna um hesi viðurskifti:

1. Bygnaðurin av roknskaparhaldinum í stovnunum.
2. Umsiting av útreiðslum og inntøkum.
3. Roknskaparskráseting.
4. Út og inngjaldingar.
5. Eftirlit við virðisposti.
6. Framløga av mánaðar- og ársroknskapum.
7. Goymsla av roknskapartilfari.
8. Vørugoymsluumsiting.
9. Virðisbrævaumsiting.
10. Legatumsiting
11. Umsiting av øðrum ognum.
12. Edv-nýsla.

Annars heldur meirilutin, at arbeiðið við at formalisera viðurskiftini viðvíkjandi almennu roknskapunum hongur neyvt saman við, hvørjar nútíðarhóskandi edv-skipan, gjaldstovan kemur at ráða yvir. Meirilutin leggur dent á, at ein formalisering av hesum viðurskiftum er ein avgjørd treyt, um vit skulu loysa tær búskaparstýringsuppgávurnar, sum miðað verður eftir at loysa, bæði í álitinum frá roknskaparbólkinum og í viðmerkingum landsstýrisins til lógaruppskotið.

Edv-konseptið fyri edv-skipan, sum gjaldstovan hevur í dag stavar frá sjeyti- og áttatiárunum. Við teimum alsamt vaksandi krøvunum til roknskaparhald landsins, verður tað jarlørt og í nøkrum førum ógjørligt at honorera hesi krov við verandi edv-skipan. Í stóran mun er hesin spurningur tengdur at teimum krøvum, sum verða sett í kunngerðini. Mett verður, at tað er av stórum týdningi, at arbeitt verður viðari við at útvega eina tíðarhóskandi edv-skipan til roknskaparhald landsins.

Landsstýrið hevur skotið upp, at nýggja lógin um landsins almenna roknskaparhald kemur í gildi frá 1. januar 1994. Meirilutin heldur, at lógin skal fáa gildi frá 1. januar 1995 soleiðis, at avvarðandi stovnar í góðari tíð hava høvi til at fyrireika seg til at umsita nyggju lóggávuna. Samsvarandi hesum setir meirilutin fram soljóðandi

Broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Í § 6 verður dagfestingin "1. januar 1994" broytt til: "1. januar 1995".	I § 6 ændres datoen "1. januar 1994" til: "1. januar 1995".

Við hesum viðmerkingum mælir meirilutin løgtingslutum til at samtykkja uppskot landsstýrisins í løgtingsmáli nr. 162/92 um 185/93: Løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald v.m.

Ein minniluti (Tórður J. Niclasen) ásannar tó neyðuga í at hava skipað roknskaparhald og búskaparlig stýringsamboð.

Tó sitrir minnilutin fyri, at ein avleiðing av hesum uppskoti landsstýrisins verður ein centralisering av virksemi og fíggjarligari stýring/ábyrgd, sum í dag liggur hjá stovnum kring landið.

Undir viðgerðini í fíggjarnevndini er ikki trygd fingin fyri, at so ikki verður.

Tí kann minnilutin ikki taka undir við uppskotinum.

2. viðgerð 1. februar 1994. Uppskotið við broyting frá fíggjarnevndini samtykt við 20-0 atkvøðum.

3. viðgerð 8. februar 1994. Uppskotið enkaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

Lóg nr. 33 frá 23. mars 1994.

86 Samskifti landsstýrisins við peningastovnar og ábyrgd landsstýrisins at lætta um trongstøðu hjá húsarhaldunum.

Ár 1994, hósdagin 20. januar legði Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður, [illegible] sum somiðandi:

Viðmerkingar

Longa á vetri í 1989 gjørdi uppskotsstillarin vart við, at støða seinusaeigaranna fór at verða trupul og at tað ti varð neydugt at gera munagóð tilhøk, tí tess at leysa um bygdarnar hjá mangari familju kring landið.

Politikkurin, sum síðan hevur verið fordut, hevur gjort støduna hiá nógvum seinusaeigara óloliga!

Ófatligt, at politiski myndugleikin ikki hevur dugað at sæð, at hægri skattur, lágir avgjald, "kamuflerudur" ognarskattur (renta- og tiggjarognaravgjald o.s.tr., o.s.tr. fóru at oydileggja forumeyrirnar, hjá mangari familju at fáa endarnar at rokka og tí ikki at kiara neydugar husarhaldsútreiðslur og transheldur at rinda peningastovnunum rentur og avdrog.

I sambandi við tey 100 tals miliónirnar, sum landsstýrið hevur lánt upp á naskan av tí føroyska skattegjaldaranum, hevur uppskotsstillarin hvørja ferð avvarðandi mál hava ringið viðgerð á dingi m.a. spurt:

"Í hvønn mun koma hesar miliónir at hjálpa upp á støduna hjá teimum nógvu seinusaeigarunum kring landið?"

Eisini hevur uppskotsstillarin havt uppskot um, at partur av tí peningi sum verður fluttur úr Danmarkini verður nýttur til framleiðsluskapandi virksemi, sum so aftur avvirkaði gongdina í samfelagnum tann positiva vegin.

Hvat støðu húsaeigaranna viðvikur, so gjørdust rentulækkingin hjá peningastovnunum ikki tann lætti, hann var ætlaður at vera. Hetta beint orsakað av, at landsstýrið og peningastovnarnir ikki sam ov lítið saman, og tí ikki vita hvat hvor fyritekur sær fyrr enn avgerðir eru teknar.

Her liggur stór ábyrgd fyrst og fremst hiá landsstýrinum og ikki minst, sum støðan nú er vorðin á seinusamarknaðinum, er tað av stórsta tydningi, at landsstýrið javnan hevur samband við peningastovnarnar.

Tað átti ikki at verið neydugt, men tvørturímóti tykist at vera, at áleggja landsstýrinum javnan at hava fundir við peningastovnarnar og verður tí skotið upp soljóðandi

I Uppskot

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið at taka stig til eitt neyvari samstarv við peningastovnarnar.

Tá nú peningastovnarnir hava lækkað rentuna og landskassin fingið ágóðan av. at rentufrádrátturin í skattinum gerst minni so eigur landsstýrið nú at vísa góðan vilja og seta tiltøk í verk, sum beinanvegin merkjast sum lætti í dagliga húsarhaldinum hjá fólki.

Her verður t.d. hugsað um, at avtaka oljuavgjaldið ella avtaka MVG á olju og streymmýtslu.

Tí verður skotið upp soljóðandi

II Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at seta tiltøk í verk sum beinanvegin lætta um í dagliga húsarhaldinum, t.d. við at avtaka MVG á olju og streymmýtslu.

Ein møguleiki, har Húsalánsgrunnurin kann verða við at hjálpa upp á stoðir selhúsaeigaranna, er at hesin fær heimild at "niðurfrysta" lán í eitt ávíst áramál og kanska eisini at leingja um avdráttartíðina - um fólk skuldi havt ynski um tað.

Samsvarandi hesum verður tí skotið upp soljóðandi

III Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstyrinum sum skjótast at virka fyri broytingum í lógini um Húsalánsgrunnin, soleiðis at hesin fær heimild at "niðurfrysta" lán og leingja um avdráttartíðina.

1. viðgerð 26. januar 1994. Málið verð beint í tinggjarnevndina, sum 16. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Jordi I. Niclasen, løgtingsmanni, tann 20. januar 1994 og eftir 1. viðgerð 26. januar 1994 beint í tinggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í eitt meirtluta og tríggjar minnilutar.

Meirlutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen og Helena Dam á Neystabø) tekur ikki undir við málinum.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen) tekur stoða í tingsetilinum.

Minnilutin (Birgir Dam Nielsen) vísir til uppskot frá fólkaflokkinum í løgtingsmáli nr. 75/1993: Skuldaravskriving av seinúsum í bankunum, sala av partapeningunum í føroysku bankunum og tryggjing av monopolbanka.

Minnilutin (Torder J. Nielsen) tekur undir við málinum.

2. viðgerð 22. mars 1994. Uppskriðið nr. I fall við 10-0 atkvøðum, uppskot nr. II fall við 8-0 atkvøðum og uppskot nr. III vard atkvøtt.

87 Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald

Á 1994, friggadagin 21. januar legði Jógvan I. Olsen, løgtingsmaður, vegna sambandsflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 12 verður skoyti upp í fimta k:
"olja, salt, ísur, pakkitilfar og agn."

2) Í § 27 verður sett sum nýtt stk. 9:

lagtingslov om ændring af merværdisatgift.

§ 1.

I lagtingslov nr. 136 af 8. september 1992 om merværdisætningsafgift med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 12 tilføjes til femte k:
"Olie, salt, is, emballage og agn."
2) I § 27 indsættes som nyt stk. 9:
"Olie, salt, is, emballage og agn kan

"Olja, salt, ísur, pakkinálfar og agn kunnu innflytast avgjaldsfrítt."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

importeres afgiftsfrit."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar

MVG-gjaldið, sum fiskiskip skulu gjalda fyri útgerð, er sett tyngjandi fyri teirra rakstur. Sjálvt um fiskiskip fáa hetta MVG-gjaldið aftargoldið, so hindrar hetta gjaldfori teirra munandi, og tí skjýtur sambandsflokkurin upp at broyta lógina fyri ávísar vøruslóðkar á sama hátt, sum lógin er broytt fyri fiskaútreiðskap.

Hetta avirkar skapini til í stórri mun at landa og taka útgerð í Føroyum, og tað vil ókja um virksemið her heima.

Eisini sparir hetta umsiting bæði hjá tí almenna og skipaeigarunum.

1. viðgerð 26. januar 1994. Málið varð hevnt í skattanevndina, sum 21. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av sambandsflokkinum tann 21. januar 1994 og eftir 1. viðgerð 26. januar 1994 hevnt í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjort málið og vísir til løgtingsmál nr. 54/93: Broyting í løgtingslóg um merviroðisgjald - og setir einki uppskot fram um broyting.

Málið varð atkvøtt.

88 Íløgustuðul til alivinnuna

Á 1994, tirsdagin 25. januar tók *Thomas Arabo, landsstýrismaður, fram soljóðandi*

U p p s k o t

til

løgtingslóg um íløgustuðul til alivinnuna.

§ 1. Endamálið við hesi lóg er at veita alarum ein tíðaravmarkaðan íløgustuðul, sum verður veittur sum stuðul til smoltkeyp fyri at elva til umstruktureringar og umleggingar innan alivinnuna.
Stk. 2. Smolt verður í hesi lóg at skilja sum laksasmolt og sjóbúgvin sil.
Stk. 3. Stuðulin verður givin fyri smoltargangin 1994.

§ 2. Landsstýrinum verður heimlað í árligu játtanini á løgtingsfíggjarlógini fyri 1994 veita stuðul til útsetan av í mesta lagi 5 mió. smolt.
Stk. 2. Stuðulin verður latin soleiðis, at alarar á sjónum í mesta lagi kunnu fáa 5 kr. í stuðuli fyri hvørn smoltin undir teimum treytum, sum eru nevndar í § 3 í hesi lóg.
Stk. 3. Hámarksprisur verður settur fyri smoltið, ið skal hava stuðul. Landsstýrið ásetur í kunngerð hámarksprís eftir sovidnum, umframt hvørjar treytir fyri útgjaldingini.

§ 3. Stuðulin er treytaður av:
a) At keyparin hevur alilógyni.
b) At seljarin hevur løgvi at ala smolt.
c) At alistøðin fær tigging, at avlop er frá rakstrinum og útlit eru fyri, at fiskurin kann alast fram til tøku.
d) At alingin fer fram samsvarandi reglunum at skipa sær fyri alingini, at hon gerst burðardygg og varandi ikast til samfelagsbúskapin.
Stk. 2. Stuðul verður ikki veittur til smolt

lagtingslov om investeringsstøtte til fiskeopdrætserhvervet.

§ 1. Formålet med denne lov er at yde fiskeopdrætterne en tidsbegrænset investeringsstøtte, som ydes som støtte til smoltkøb med henblik på at tilskynde til omstruktureringer og omlægninger inden for fiskeopdrætserhvervet.
Stk. 2. Med ordet smolt i denne lov menes laksesmolt og havmulen ørred.
Stk. 3. Støtten ydes for smoltargangen 1994.

§ 2. Landsstyret bemyndiges til af den årlige bevilling på lagtingsfinansloven for 1994 yde støtte til udsætning af maksimalt 5 mio. smolt.
Stk. 2. Støtten ydes således, at havbrugsopdrætterne maksimalt kan få 5 kr. for hver smolt under de betingelser, der er nævnt i § 3 i denne lov.
Stk. 3. Der fastsættes en maksimalpris for smolt, for hvilket der skal ydes støtte. Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse maksimalpris efter størrelse og nærmere betingelser for udbetalingen af støtten.

§ 3. Støtten er betinget af:
a) At køberen har opdrætstilladelse.
b) At sælgeren har tilladelse til at opdrætte smolt.
c) At opdrættet får bevilget finansiering, at driften giver overskud, og at udsigt er til, at fisken kan opdrættes frem til slagtning.
d) At opdrættet sker i henhold til forsøgene på at få opdrættet til at være hærdygtigt og et varende tilskud til

alt út um loyvið hjá avvarðandi smoltalara.

Stk. 3. Studulin verður ikki givin til smolt, sum skal nytast til vísindaligar royndir.

samfundsøkonomien.

Stk. 2. Støtte ydes ikke til smolt der overstiger vedkommende smoltopdrætters tilladelse.

Stk. 3. Støtten ydes ikke af smolt, der skal benyttes til videnskabelige forsøg.

§ 4. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 73 frá 2. apríl 1993 um íløgustuðul til alivinnuna.

§ 4. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen. Samtidig træder lagtingslov nr. 73 af 2. april 1993 om investeringsstotte til fisketierhvervet ud af kraft.

Viðmerkingar:

Við heimild í løgtingslóg nr. 73 frá 2. apríl 1993 um íløgustuðul til alivinnuna og kunngerð nr. 75 frá 2. apríl 1993 um reglur fyri íløgustuðli til alvinnuna, er landsstýrið heimild av at veita akarum íløgustuðul uppá í meðal 5 kr. fyri smoltið til í mesta lagi 5 mió. smolt. Hetta merkir, at neyðugt er við eini játtan á fíggjarlógini uppá upp til 25 mió. kr.

Higartil í ár hava akarar fingið studul til keyp av 4 mió. smoltum og ventandi verður smoltframleiðslan í landinum um 5 mió. smolt í 1994.

Játtanin á løgtingsfíggjarlógini fyri 1994 er 15 mió. kr., og um allir skulu hava stuðul, er neyðugt at brotyta lógina og reglugerðina soleiðis, at hon er í samsvari við hesa upphæddd.

Íløgustuðulin fer sostatt at liggja millum 3 og 5 kr. fyri hvørt smoltið, alt eftir hvussu stóra nøgd av smolti tilsamans verður søkt um. Við hesum uppskotunum er neyðugt at seta í kunngerðina eina freist fyri at søkja um stuðul, soleiðis at umsoknir, sum koma aftanáa hendan ásetta dag, ikki fáa stuðul.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

§ 1, stk. 3 er nytt stk. Játtanin er bundin at ti smolti, id verður sett til í 1994.

§ 2, stk. 1: Greinin er broytt soleiðis, at studulin bert verður givin fyri fíggjarárið 1994. Í galdandi lóg stendur 1993, 1994 og 95.

§ 2, stk. 2 verður broytt til, at í staðin fyri at skriva "í meðal 5 kr. fyri hvørt smoltið" verður skrivað: "í mesta lagi 5 kr. fyri hvørt smoltið".

Í **§ 3** eru punktini a) og b) í stk. 1 og stk. 2 nýggj og eru hesi sett inn, fyri at ivamál ikki skal vera um, hvør skal hava stuðul.

§ 4 í nugaldandi lóg, sum sigur, at umboð frá landsdjóraeftirlitinum, fiskivinnuumsitingini og fiskirannsóknarstovuni skulu umsita stuðulin, er ikki hurturúr, tí umsitingarlig maðkagongd nú er tastløgd í landsstýrinum.

1. viðgerð 2. februar 1994. Málið verð heint í idnaðarnevndina. sum 4. mai 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 21. januar 1994 og eftir 1. viðgerð 2. februar 1994 heint í idnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt tund við Føroya Havbúnaðarfelag.

Nevndin hevur býtt seg í ein meirihluta og tvær minnihlutar.

Meirihlutin (Heini O. Heinesen, Jacob Lindenskov og Karl Heri Joensen) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnihlutin (Jógvan Sundstein) tekur ikki undir við uppskotinum. Tá lógin varð sett í gildi í 1993 skuldi hon hava gildi fyri árini 1993, 1994 og 1995 og lætast skuldi kr. 5. fyri smoltið.

At avtaka lógina í tíðarskeiðinum er ikki bara vánaligt loggávuarbeiði, men kann eisini siðustillast við eksportmiðlum. Hetta kann eisini hava endurgjald við sær.

Haraftrat sparkar hetta uppskotið beinini undan endurreisnini av alivinnuni, sum annars hóst var komin væl áleiðis.

Minnihlutin (Jógvan Sundstein) heitur á tingmenn um ikki at taka undir við uppskotinum.

Minnihlutin (Finnbogi Arge) tekur ikki undir við uppskotinum og vísir á, at vinnan hevur disponerað út frá galdandi lóg, sum leyntir yvir trý ár, og at landsstýrið við fyrituggjandi uppskotið ger sítt til at taka stoðið undan alivinnuni.

2. viðgerð 4. mai 1994. Atkvøði vóru við navnakalli. Uppskotið fall við 13 ja-atkvøðum, 14 nei-atkvøðum, 5 atkvøddu ikki.

FL jur. 2600-1/94.

89 Góðkenning av Montreal-sáttmálanum og uppískoytisfrumskjal til sáttmálan

Ár 1994, týsdagin 25. januar legði Sjúrður á Brúnni, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið viðmælir, at Føroyar taka undir við danskari háveldisstaðfesting av "Konvention af 23. september 1971 til bekæmpelse af ulovlige handlinger mod den civile luftfarts sikkerhed" og "protokol af 29. februar 1988 til bekæmpelse af ulovlige voldshandlinger i lufthavne, der betjener den internationale civile luftfart".

Viðmerkingar

Danmark hevur við fyrivarni fyri Føroyar tann 2. januar 1973 háveldisstaðfest "konventionen af 23. septembar 1971 til bekæmpelse af ulovlige handlinger mod den civile luftfarts sikkerhed" (Montreal-sáttmálin), og tann 20. oktober 1989 "protokol af 24. februar 1988 til bekæmpelse af ulovlige voldshandlinger i lufthavne, der betjener den internationale civile luftfart" (uppískoytisfrumskjalið).

Ríkisumboðið spyr nú, um føroyskir myndugleikar hava nakað ímóti, at fyrivarnið dettur burtur.

Eftir art. 3 í sáttmálanum binda partarnir seg til at áseta stranga revsing fyri ov brotsverk, sum nevnd eru í art. 1. Hesi skulgva seg an gerðir, sum kunna seta flúgvitrygdina í vanda.

Eftir § 5 binda partarnir seg til at útvega sær nevndga lógsogn til rættarliga at sókja at brotsgerðunum.

Somuleiðis eru reglur um útlygging av brotsmonnum til rættarsókn (art. 6-8), um fráboðanarskyldur (art. 12 og 13), umframt vanligar rættargongureglur um framleiðslu, gildiskoma v.m.

Danska lógmálaráðið metir ikki, at sáttmálin og frumskjalið krevja broytingar í føroysku revsilógini.

Mælt verður til at góðkenna, at háveldisstaðfestingarfyrivarnið viðvíkjandi Føroyum dettur burtur.

Í viðgerð 1. februar 1994. Málið varð hildið í rættarnevndina, sum 12. apríl 1994 lovaði hetta soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. januar 1994 og eftir í viðgerð 1. februar 1994 heint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjort málið og mælir løgtingnum til at góðkenna Montreal-sáttmalan og uppiskoytisframskjalið til sáttmalan, sum landsstýrið hevur lagt fyri tingið.

Málið snýr seg um revsireglur fyri brotsverk, ið seta flogtryggdina í vanda. Føroya Landsstýri upplýsir, at nevndi sáttmáli krevur hvørki broytingar í føroysku revsilógini ella broytingar í marknagongdini viðvíkjandi flogtryggdini á flogvallinum.

2. viðgerð 15. apríl 1994. Uppskotið varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

FL jnr. 1840-5/92.

90 Broyting í løgtingslóg um minstuløn, dagsstudning og minstaforvinning

Ár 1994, týsdagin 25. januar legði John Petersen, løgtingsmaður, vegna tilkallaðkin fram valjóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn, dagsstudning og minstaforvinning við seinni broytingum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 32 frá 27. mars 1992 um minstuløn, dagsstudning og minstaforvinning við seinni broytingum verður gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 3, nr. 3, litra b, verður í staðin fyri "25 kilo" sett: "15 kilo".
2) Í § 3, nr. 3, litra c, verður í staðin fyri "50 kilo" sett: "35 kilo"

lagtingslov om ændring i lagtingslov om mindsteløn, dagsstøtte og mindsteindtægt med senere ændringer.

§ 1.

I lagtingslov nr. 32 af 27 marts 1992 om mindsteløn, dagsstøtte og mindsteindtægt med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 3, nr. 3, litra b, indsættes i stedet for "25 kilo": "15 kilo".
2) I § 3, nr. 3, litra c indsættes i stedet for "50 kilo": "35 kilo".

3) Í § 3, nr. 3, verður skoytt uppí sum nýtt litra d:
"Útróðrarmaður, ið annars uppfyllir treytirnar í hesi lóg, tó undantikið litra a í § 3, nr. 3, skal vetrarmánaðirnar frá og við november til og við mars mánaði altíð verða tryggjaður minstulón. Treytin fyri minstulón er, at farið, ið viðkomandi er við, hevur minst 5 avreiðingar um mánaðin ella 10 avreiðingar í november og december og 15 avreiðingar januar-mars, og eiga hesar at svara til tað, tá nevnt er í litra b og c í hesi grein."

§ 2.
Henda lóg kemur í gildi 1. februar 1994.

3) I § 3, nr. 3, tilføjes som nyt litra d:
"Bådfisker, som iøvrigt opfylder betingelserne i denne lov, dog undtaget litra a i § 3, nr. 3, skal i vintermånederne fra og med november til og med marts måned altid sikres mindstehyre. Betingelserne for minstehyre er, at båden, som vedkommende er med, har mindst 5 indhandlinger om måneden eller 10 indhandlinger i november og december og 15 indhandlinger januar-marts, og skal disse være tilsvarende det, som nævnt er under litra b og c i denne paragraf."

§ 2.
Denne lov træder i kraft 1. februar 1994.

Viðmerkingar

Vit hava hoyrt: Heiri fetóir síðan tjor heyst og ígjognum allan veturin, at lovað hevur verið, at útróðrarmaðurin, ið rør út við útróðrarbátum, ið eru undir 20 brt., skal fáa eina skipaða við minstulón.

Eingin skipan er komin enn, sjálvt um útróðrarfelog hetði hava sent uppskot og lovað at verið við at gjørt eina skipan saman við landsstýrinum, tí er einki hent. Vit eru komin í eitt nytt ár, og januar mánaður er brátt at enda, og stoðin versnar hvønn dag hjá hesum monnum. Vit striðast hvønn dag við sanceringum, avskrivingum, nýjáttan av nýggjum kapitali, vit leggja nógva orku í, at arbeiðsloysisskipanin ikki skal fara fyri bakka, sum nú eisini er neyðugt. Vit vita eisini, nvussu skipanin hjá útróðrarmannunum er, teimum er álagt við lóg at gjalda inn í skipanina, men hann fær einki útgoldið, tí haldi eg, at tingið eigur at fáa fram hesa broyting sum skjótast.

Tá løgtingslóg nr. 32 frá 27. mars 1992 um minstulón, dagsstudning og mitstaforvirkning varð samtykt í løgtinginum, skulu vit minnast at, at umstoðurnar vóru heilt øðrvísi, enn tær eru nú.

Vit fiskaðu yvir 100.000 tons á Føroyaleiðini, nú er tað ikki meir enn góð 60.000 tons. Tey fiskasløgini, hesin parturin tekk, eru so at siga heilt burtur, tí skjóta vit upp hesar broytingar í § 3, nr. 3, litra b og c.

Tað nyggja brotið, litra d, ið kemur inn, skal geva útróðrarmonnunum við bátum undir 20 brt. eina minstulónarskipan.

Skipanin er gjørd soleiðis, at menn hava møguleika at vinna meir enn tey 50% av tí, tey fortinna við útróðri í hesum tíðarskeiði. Skipanin forðar heldur ikki fyri, at menn royna at fortinna sum mest í tíðarskeiðinum.

Tó skal øll innleka, ið forvinnan verður tyri hvønn mánað mótroknast í tingjaldi av minstulønini hetta tíðarskeiðið.

1. viðgerð 1. februar 1994. Málið verð heint í fiskivinnunevndina, sum 4. mars 1994 legði fram søljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 25. januar 1994 og eftir 1. viðgerð 1. februar 1994 heint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilutа og ein minnilutа.

Meirilutin (Heine O. Heinesen, Jógvan A. Johannessen, Henrik Old, Karl Heri Joensen, Jógvan í. Olsen og Niels Pauli Danielsen) vísir á løgtingsmál nr. 98/1993: Løgtingslóg um minstuløn til útróðrarmenn, sum ein samd fiskivinnunevnd ætlar tinginum til at samtykkja við ávísum broytingum og setir til eingi uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Sandsteinn tekur í fyrsta lagi undir við fyriliggjandi uppskoti og mælir tinginum til at samtykkja tað. Í øðrum lagi tekur minnilutin undir við løgtingsmáli 98/1993: Løgtingslóg um minstuløn til útróðrarmenn við teimum broytingum, sum fiskivinnunevndin hevur skotað upp.

2. viðgerð 4. mars 1994. Uppskotið fall við 6-0 atkvøðum.

91 Løgtingsviðgerð av stýrisskipan og av bygnað til landsfyrisiting, áðrenn forstjóri verður settur

Ár 1994, mikudagin 2. februar legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna tilkallokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum, at starvið sum forstjóri í Tinganesi o.a. støry í landsumsitingini verða ikki sett, fyrrenn eftir, at løgtingið hevur viðgjørt liðugt lógina um stýrisskipan.

Viðmerkingar

Svarið, sum løgmaður upp á standandi fót gav undirtøkuna til fyrisporing um ætlanir landsstýrisins at seta forstjóra yvir ollum øðrum í Tinganesi, vakti fleiri ampar, enn tað dugdi.

Ordaskiftið um fyrispurningin avdúkaði tíbetur ósemju í samgonguni um tað ráðiliga í at geva einum byrokrati so stórt vald, sum lýsingin eftir umsøkjarum til forstjórastarvið bar boð um.

Verandi fiskivinnustjóri er imillum ter (burtursæð frá honum sjálvum) lógkønu høvundarnar, sum løgdu fram prýðiliga bókaverkið um nýggja styrisskipan fyri Føroyar. Ikki ótrúgsandi, hann hevur havt forstjórastarvið í huga, tá hansara fingramerki vórðu sett á uppskotið.

Tað er ikki annað enn sjálvsagt krav frá løgtingsins síðu, at slík stormál sum nýggj styrisskipanarlóg verða liðugt viðgjord og avgreidd av tingmum, áðrenn embætisstorvini innan karmarnar á slíkari lóg verða sett.

Eftir politisku tilvildirnar í 80-árunum, tá verandi fiskivinnustjóri var millum tremstu ráðgevar landsstyrisins í fiskivinnuligum miljardprojektum, er nú neyðugt, at lógirnar verða smíðaðar fyrst, so personligar avgerðir verða tiknar innan fyri lógarammar fastu karmar og ikki øvugt.

Men hetta fyrivarnið er ikki nóg mikið. Løgmaður hevur alsamt róð framundir, at ein uppgáva forstjórans verður at geta uppskot til nýggjan bygnað fyri almennu fyrisitingina.

Her er tydiliga talan um, at ein embætismaður, um hann longu er settur við diktatoriskum starvsheimildum yvir øðrum tænastumonnum og deildarleiðarum, sleppur at evna eina fyrisitingarliga 'grundlóg" til, sum er bygd upp um hansara persónligu starvsstøðu. Til hennara skal so øll almenn fyrisiting, t.e. alt hitt fyrisitingarliga valdið, passa. Henda byrokratiska tullmakt er ikki sørt nok einum statskvetti. "Vatnaeu skou" skulu eyðvitað verða millum løggevandi og útinnandi valdið. Men so er livsneyðugt, at ein framsókin forstjóri ikki

ær lógartryggjaða persónliga makt til at forða tingsins lógum at fáa gildi.

Til at verja fólkastýrið móti fyrisitingarligari valdsnýtslu av ensnókum embætismonnum, sum longu er settur í starv og tí kann ikki sigast upp, verður sett fram fylgjandi

Il l' p p s k o t

til

samtykt

Løgtingið áleggur landsstýrinum at seta nevnd, sum hvør tingflokkur velir ein sakkonan lim í, til at gera uppskot um bygnað fyri landsfyrisitingina. Tilmæli hennara skal verða liðugt viðgjørt av løgtinginum, áðrenn landsstýrið setir forstjóra í Tinganesi.

Viðmerkingar

Vit vita av ringum og gytum royndum í 80 árunum, at við kollegialskipanini í landsstyrinum vóru so nógvir um ábyrgdina, at tað sum regul eydnaðist at taka lívið av henni. Prísin rinda vit nú.

Tað er rætt at seta í verk ministeraskipan fyri dúmmandi politiska valdið. Við henni ábyrgist hvør landsstýrismaður, løgfrøðiligur deildarleiðari og fullmegt sær av egnum avgerðum og handlingum.

Júst tí er tað burturvið at seta eitt forstjóra við háls- og bondsrætti yvir øllum landsstýrismonnum og deildarleiðarunum, sum hvør sær eins og flestu fullmegtir hava løgfrøðiliga útbúgving og eru settir í starv, júst tí tey hava faklíga kompetansu. Tað er í stríð við lógir og reglur, og eisini starvstreytur teirra, at tænastumenn við persónligari ábyrgd av egnum avgerðum kunnu verða settir til víks av einum yvirordnaðum forstjóra.

Tí eru uppskotini til samtyktar ongantíð eitt náttúrligt krav frá løgtinginum til landsstýrið til tess at verja demokratið móti uppaftur stórri valdsnýtslu, utan fólkaræðisligt mandat, enn vit longu hava frammanundan í formi av tí donsku "bankafútunum", sum eru um at leggja búskap okkara í forna.

1. viðgerð 15. februar 1994. Málið verður beint í rættarnevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Óla Breckmann, løgtingsmanni, 2. februar 1994 og eftir 1. viðgerð 15. februar 1994 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og tekur ikki undir við uppskoti 1 til samtyktar samhvørt teirri áskoðan, at einstakir personar og einstakar starvssetanir í landsumsitingini ikki eiga at verða viðgjørdar í løgtinginum á hendan hátt.

Viðgerð av nyggjari stýrisskipanarlóg fyri Føroyar er nú byrjað, og verður lógin møguliga samtykt í hesari tingsetuni. Rættarnevndin metir tað heintast, at landsstýrið og løgtingið í sama viðfangi viðgera bygnaðin í landsfyrisitingini og setir sambært hesum sjónarmið fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Heitt verður á løgting og landsstýri í sambandi við viðgerðina av nýggjari stýrisskipanarlóg fyri Føroyar eisini at evna til uppskot til bygnað í landsfyrisitingini.

Verður uppskot rættarnevndarinnar samtykt, verður ikki mett neyðugt at samtykkja uppskot III í løgtingsmál nr. 91/1993.

2. viðgerð 22. apríl 1994. Uppskotið til samtyktar frá rættarnevndini samtykt við 25 atkvøðum. Uppruna-uppskotið frá Óla Breckmann, løgtingsmanni, fall við 13-0 atkvøðum.

92 Teksting av føroyskum SVF-sendingum fyri deyv

Ár 1994, tísdagin 25. januar leddi John Petersen, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at bera so í bandi, at føroyskar SV-sendingar verða tekstaðar, so eisini deyvir hyggjurar kunnu fáa fulla nyttu burtur úr teimum.

Viðmerkingar

Sum tíðstu ábrir almennur stovnar mugu SvF vera stoppur sniðkaleysur undan huskaparsreppum. Ja, enntá hevur óskurt grund verið um, at SV-gjaldið skal hækka. Í hetta hoast millum 1/4 og 1/3 av hyggjaragjaldinum fyri 92 og 93 stendur uti enn og er trupult at krevja inn. Ti

vanliga føroyska húsarhaldið fær ikki til livsins uppihald.

Framstig eru sum vera man hent við SvF síðan byrjan fyri 10 árum síðan. Umframt SV-tíðindi verða fleiri føroyskar sendingar gjørdar, sum nógv fólk hyggja at. Fast tíðindasending er fyri deyv. Eisini verða fleiri útlendskar sendingar tekstaðar til føroyskt.

Men tær vanligu føroysku sendingarnar plaga ikki at hava føroyskan undirtekst, hóast tær ofta eru gjørdar væl, áðrenn tær verða sendar. Tíðskil er tað ikki av tíðarneyð, men heldur av tvørranci arbeiðsorku, ella ti tað verður hildið óneyðugt, at føroysku sendingarnar organ undirtekst hava.

Samstundis siggja vit tó ofta føroyskan tekst klistraðar uttan á danskan tekststrommin. Hetta helst fyri at venja fólk í huganum til at lyða at fremmandum málum til føroyskt. Helst rætt hugsað.

Men ivaleyst hevði tað verið til stóra gagn fyri tænarar, sum skulu klára seg uttan hoyrnina, um eisini føroyskar sendingar, sum nú tær aktuellu og sendingarnar sunnukvøld, hevdu havt føroyskt tekstband undir myndini.

Honda løgtingssamtykt eigur tó ikki at kosta stovnunum eyka. Tí má Vørðslan tála álagt at hrúka onkrar av teim 30–40 starvsfólkunum, sum longu eru á stovnunum, til hetta týðingar- og tekstingararbeiði. Ella kann SvF flyta onkran av týðarunum, sum nú klistra føroyskan undirtekst uttan á danskan tekst, til at teksta føroyskar SV-sendingar. So fáa okkara deyvu somu gagn og gleði og gagn hurtur úr góðu føroysku sendingunum sum aðrir hyggjarar.

1. viðgerð 2. februar 1994. Málið varð beint í mentanar- og skúlanevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av John Petersen, løgtingsmanni, tann 25. januar 1994 og eftir 1. viðgerð 2. februar 1994 beint í mentanar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt fund við Árna Gregersen, stjóra hjá Sjónvarp Føroya. Upplýst varð, at teksting av sjónvarpssendingum bæði kostar nógv og krevur nógva orka. Av tíðarorsøkum ber tað ikki til at teksta aktuellar sendingar, heldur ikki í londum við framkomnum sjónvarpssendineti og útgerð.

Nevndin hevur undir viðgerðini hýst seg í eina metingina og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Nielsen, Jógvan A. Johannessen og Helena Dam á Neystabø) er av teirri áskoðan, at tað er ein betri løysn, at sjónvarpið veitir teimum hoyriveiku í Føroyum eina breiðari tænastu enn áður í sambandi við tað ásannaða menningarstigið, sum liggur í tekstvarping m.a. av tíðindum.

Meirihlutin heldur ikki, at tað er heint at leggja landsstýrinum at bera so í bandi, at føroyske SvF-sendingarnar verða tekstaðar úr tað samband sjónvarpsstjóranum kortini verður gjørt í mest møguligan mun. Mælt verður tí til, at SvF eisini framyvir veitir teimum deyvu eitt so

góða tænastu sum gjørligt er, og at serligur dentur verður lagdur á føroyskar sendingar.

Minnilutin (Óli Breckmann) vísir á, at av tí at SvF tekstar nógvar útlendskar sendingar, essini tað meir ivasamt er, hvussu tørvur og ávani um valjan á stovninum um at prioritera tekstingina soleiðis, at tær føroysku sendingarnar, sum ofta verða upptiknar og redigeraðar í hvussu er dagar undan sýning, verða tekstaðar í mest møguligan mun, so eisini dulir føroyingar fáa somu gleði av hesum føroysku sendingum sum tey vit hoyra. Minnilutin (Óli Breckmann) sum eisini legði uppskotið fram, mælir tinginum til at samtykkja tað.

Minnilutin (Terje Davidsen) tekur undir við meirilutanum og viðmerkir annars, at tað kundi verið ein loysn at gera tekstvarpssendingar, har t.d. samandráttur av tíðindum verða sendir og endursendir.

2. viðgerð 12. apríl 1994. Uppskotið lá við 13 ja atkvøðan.

93 Minstaløn til útróðrarmenn

Á 1994. ýsdagin 25. januar legði Niels Pauli Danielsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstaløn, dagsstudning og minstalervinning við seinni broytingum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 32 frá 27. mars 1992 um minstaløn, dagsstudning og minstalervinning, broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 16. november 1992 og løgtingslóg nr. 44 frá 23 mars 1993 verða hesar broytingar gjørdar:

1) § 3, nr. 2 verður soljóðandi:
"Manning á fiskifarum á útróðri á føroysku landleiðini verður latin minstaløn teir 6 mánaðirnar av ár-

lagtingslov om ændring af lagtingslov om mindsteløn, dagsstøtte og mindsteindtægt med senere ændringer.

§ 1.

I lagtingslov nr. 32 af 27. marts 1992 om mindsteløn, dagsstøtte og mindsteindtægt, ændret ved lagtingslov nr. 159 af 16. november 1992 og lagtingslov nr. 44 af 23. marts 1993 foretages følgende ændringer:

1) § 3, nr. 2 affattes således:
"Mandskab på fiskefartøj i hjemmefiskeri inden for færøsk fiskerizone får udbetalt mindsteløn de 6

num (oktober, november, december, januar, februar og marts). Minstalønin er kr. 7.500 + minstaforvinding hvønn mánað upp til kr. 12.725. Er inntøkan hjá útróðrarmanni meira enn kr. 12.725 eitt mánað, verður upphæddin yvir kr. 12.725 mótroknað í minstalønini (7.500). Bátsformaðurin skal boða Lønjavningargrunni skipsfiskimanna frá manning sini.

2) § 3, nr. 2 verður nr. 3.

3) § 3, nr. 3 verður strikað, og § 3, nr. 4 verður nr. 3.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. februar 1994.

månederne af året oktober, november, december januar, februar og marts). Mindstelønnen er kr. 7.500 + mindstetillæg hver måned til max kr. 12.725. Er indtægten for hjemmefiskeri mere end kr. 12.725 en måned, bliver beløbet over kr. 12.725 modregnet i mindstelønnen (7.500). Bådens formand skal oplyse "Lønjavningsgrunnur Skipsfiskimanna" om bådens mandskab.

2) § 3, nr. 2 bliver nr. 3.

3) § 3, nr. 3 udgår og § 3, nr. 4 bliver nr. 3.

§ 2.

Denne lov træder i kraft den 1. februar 1994.

Viðmerkingar

Útróðrarmenn eru sera illa fyri.

Teir gjalda inn í arbeiðsloysisskipanina, men fáa einki frá skipanini, um teir gerast arbeiðsleysir uttan so, at veiðuloyvi er tikið frá teimum. útróðrarfarið ella partur teirra í bátinum seldur. farið á hásagang ella farið verður ikki aftur við sama báti í 1 ár (tó 2 mánaðir fyri útróðrarmenn, ið ongan part eiga í bátinum) samanber regium í kunngerð frá 31. juli 1992, sum stýrið fyri ALS hevur lýst.

Hin 21. januar 1993 legði uraitrinaði fyri krisiliga fólkatokkin Føroya framburðs- og tiskivinnuflokk uppskot a ting um útróðrarmenn og arbeiðsloysisskipanina. Hin 11. mai í fjor samtykti Føroya Løgting at áleggja landsstýrinum at kanna málið og gera tað so, at tey, sum gjalda inn í arbeiðsloysisskipanina, fáa sama rætt til útgjald.

Enn er tó einki liðugt frá nøkrum um hetta.

Ímeðan versnar støðan hjá útróðrarmonnum. Hinasta innøkuryggi teirra er minstaforvinningur.

Men eisini har hevur løgtingið samtykt at sett avmarkingar í verk og krevja, at avreitt verða minst 50 kilo upp á mannin við líðu og 25 kilo við snellu ella snori fyri at fáa minstaforvinning. Lítið av fiski er at fáa, so at nógvir útróðrarmenn fáa ikki tey krevdu kiloini upp á mannin til minstaforvinning.

Tað sæst eisini í tølunum, sum Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna hevur útgoldið í 1993. Fyri minstaforvinning eru higartil útgoldin 1-0,6 mió. kr. fyri 1993 mótí 21,5 mió. kr. í 1992.

Í uppskotinum her er skotið upp at strika avmarkingina í kilo fyri hvønn mann, tí at henda avmarking er óneyðug, tá tó minstalønin verður goldin.

Haromframt verður skotið upp at veita útróðrarmannunum eina innløkutrygd upp á kr. 12.725 um mánaðin teir 6 vetrarmánaðirnar, sum svarar til minstalønina hjá øðrum mynstraðum fiskimonnum. Hesir seinnu fáa eisini dagsstuðning og hava við minstaløn/dagsstuðningi eina tryggjaða innløku upp á góðar 18.000 kr. um mánaðin ta tíð, teir eru mynstradir.

Eftir uppskotinum fáa útróðrarmenn vetrarmanaðirnar munstulon upp á kr. 7.500 – minstaforvinning við móurokning, tá ið farið verður upp um kr. 12.725. Hinar mánaðirnar av arinum fæst bara minstiforvinningurin.

Uppskotið fylgir í høvuðsheitinum einum uppskoti frá Suðuroyar Sunnara Útróðrarfelag, sum nógv av hinum útróðrarfeløgunum í landinum hava tikið undir við.

Á fíggjarlógini fyri 1993 vóru settar 76,88 mió. kr. av til innløkutrygd fiskimanna, og á eykafíggjarlógini eru settar aðrar 18,8 mió. kr., so at innløkutrygdin fyri 1993 er sett til 95,6 mió. kr. Tað er ógvuliga ivingarsamt, um hetta talið kemur at halda, tí ið lógarásetta dagsstuðningurin er vaksin úr góðum 24 mio. kr. fyri 1992 til í minsta lagi 41 mio. kr. fyri 1993 samsvarar upplýsingum frá Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna. Medan parturin hjá útróðrarmonnum úr Lønjavningargrunninum er minkaður við tívið eini helvt, er hann vaksin hjá øðrum fiskimonnum, tí at stuðningsskipanir eru burtur og prisurin tí lágur, so manningin fær.

1. viðgerð 1. februar 1994. Málið varð heint í fiskivinnunevndina, sum 4. mars 1994 legði fram soljiðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristuliga fólkaflokkinum Føroya framboðs- og fiskivinnuflokki tann 25. januar 1994 og eftir 1. viðgerð 1. februar 1994 heint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Jógvan A. Johannessen, Henrik Old, Karl Heri Joensen, Jógvan Sundstein og Jógvan I. Olsen) vísir á logtingsmál nr. 98/1993: Lagtingslóg um minstuløn til útróðrarmenn, sum ein samd fiskivinnunevnd mælir tinginum til at samtykkja við ávísum broytingum og setir tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Niels Pauli Danielsen tekur í fyrsta lagi undir við fyriliggjandi uppskoti og mælir tinginum til at samtykkja tað. Í øðrum lagi tekur minnilutin undir við logtingsmál 98/1993: Lagtingslóg um munstuløn til útróðrarmenn, við teimum broytingum, sum fiskivinnunevndin hevur skotið upp.

2. viðgerð 4. mars 1994. Uppskotið fall við 2-0 atkvøðum.

94 Broyting í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna

Ár 1994, týsdagin 25. januar legði Tordur Niclasen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirlon løgtingsmanna.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 11 frá 8. januar 1993 verður gjørd hendan broyting:

1. § 1, stk. 2 verður strikað.
2. Stk. 3 - 5 verður broytt til stk. 2 - 4.

§ 2.

Hendan lóg fer gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om vederlag og pension til lagtingsmænd.

§ 1.

I lagtingslov nr. 11 af 8. januar 1993 foretages følgende ændring:

1. § 1, stk. 2 udgår.
2. Stk. 3 - 5 ændres til stk. 2 - 4.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Á vetri 1992 kom landsstýrið í tingið við uppskoti um løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna, løgtingslóg um samsýning landsstýrismanna og um sama mundi eisini við uppskoti um broytingar í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Uppskotið um broytingar í skattalógini hevdu m.a. við sær, at ferðafrádráttarins í skattinum varð avtikin.

Uppskotini viðvíkjandi samsýning løgtings- og landsstýrismanna hevdu við sær, at ferðaútreiðsluendurgjaldið (kostnaðarendurgjald) varð varðveitt - hóast upphæddin varð nakað minkað.

Longu tá vísti undirritaði á, at tað ikki var rætt at avtaka ferðafrádráttin hjá øðrum borgarum og samstundis, at okkum sjálvum framvegis varð tryggjað endurgjald í sambandi við ferðing.

Undir 2. viðgerð 29.12.92 hevði undirritaði tí eitt broytingaruppskot hesum viðvíkjandi, men uppskotið fall. Tað fekk bert eina atkvøðu!

Tíðirnar her á landi við nógvum arbeiðsloysi eru versnaðar nógv, so vit politikarar mega skilja, at fólkið undrast, at meðan tey missa ferðafrádráttin, so er skipanin um endurgjald til løgtings- og landsstýrismenn framvegis í gildi.

Tí verður nú aftur ein roynd gjørd at fáa fram hesar broytingar.

Um uppskotið ikki vinnur frama, so eigur, tá hvussu so er, verandi skipan at verða broytt, og kundi ein gongd leið verið, at endurgjaldið verður grundað á skjalprógvaðar útreiðslur, í staðin fyri ta mánaðarligu veiting í verandi skipan. Útreiðslumarkið kundi t.d. verið verandi endurgjald + 20%.

Undirritaði ivast ikki í, at slík skipan vildi havt minni útreiðslur fyri landskassan við sær.

Samsvarandi hesum verður tí skotið upp soljóðandi

U p p s k o t

til

samtykt

Álagt verður landsstýrinum at gera broytingar í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna og landsstýrismanna soleiðis, at endurgjald bert verður latið fyri skjalprógvaðar útreiðslur.

1. viðgerð 8. februar 1994. Málið verð beint í nevndirnar, sum 17. mai 1994 legði fram soljóðandi

F e l a g s á l i t

í

løgtingsmáli nr. 94/93: Broyting í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna og nr. 95/93: Broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirlon landsstýrismanna v.m.

Málini eru løgð fram av Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, tann 25. januar 1994 og eftir 1. viðgerð 8. februar 1994 vórðu bæði beind í tinggarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málini og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirluta og ein minniluta.

Meirlutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Heini O. Heinesen, Karl Hern Joensen, Anfinn Kallsberg og Flemming Mikkelsen) mælir til, at málini verða beind í løgtingsnevndina, sum viðger uppskot landsstýrisins til nýggja styrisskipan, at viðgera saman við avvarðandi parti í nevnda lógaruppskoti og setir fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtykt

løgtingið samtykkir, at løgtingsmálini nr. 94/93: Broyting í løgtingslóg um samsýning

løgtingsmanna - og nr. 95/93: Broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m., við atliti til tær stóru uppgnaðarbroytingarnar, ið nyggja stýrisskipannarlógin fevnir um, verða beind í løgtingsnevndina, ið sum millumtinganevnd viðger uppskot landsstýrisins til nýggja stýrisskipan.

Minnilutin (Fróði J. Niclasen) mælir til at samtykkja uppskotini nr. 94 og 95/93. Í aðru sýftu verður tikið undir við meirihlutanum.

Málið varð ikki liðugt viðgjort vegna samgonguslit.

95 Broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m.

Ár 1994, týsdagin 25. januar legði Fróði J. Niclasen, løgtingsmaður, fram valfrítt

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 10 frá 8. januar 1993 verður gjørd hesin broyting:

1. § 1, stk. 4 verður strikað.

2. Stk. 5 - 6 verður broytt til stk. 4 - 5.

§ 2.

Hesin lóg fer gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om vederlag og pension m.v. til landsstyres medlemmer.

§ 1.

I lagtingslov nr. 10 af 8. januar 1993 foretages følgende ændring:

1. § 1, stk. 4 udgår.

2. Stk. 5 - 6 ændres til stk. 4 - 5.

§ 2

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Vist verður til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 94/1994.

1. viðgerð 8. februar 1994. Málið varð beint í tíggjarnevndina. sum 17. mai 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Sí felagsálit í løgtingsmáli nr. 94/1993.

Málið varð ikki liðugt viðgjørt vegna samgongueslit.

96 Veiðiloyvi bert at galda húkaveiðu

Ár 1994, vísdagin 1. februar legði Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at veiðibannið fyri húkuveiðu í kassa I og kassa III norðanfyri fer beinanvegin úr gildi.

Viðmerkingar

Tíðaravmarkað veiðibann varð sett í verk 31. januar 1994 fyri allari veiðu millum 315° rættvísandi úr Barðinum og 360° rættvísandi úr Mýlingi frá 12 fjórðingum og úteftir (kassi I).

Somuleiðis verður veiðibann fyri allari veiðu galdandi frá 1. mars til 15. apríl sett í verk fyri økið millum 345° rættvísandi úr Mýlingi og 360° rættvísandi úr Kallinum frá 12 fjórðingamarkinum inn at 4.5 fjórðingum úr grundlinjum (kassi III).

Húkaveiðan hevur tá seinastu tíðina verið fyri stórum bakkkasti, og hvat heimaumboðinum

viðvikir. er støðan hjá útróðrarmonnum og ítroinum teirra verdin otolanoi, har vána veður og vána fiskiskapur hevur gjørt seg galdandi.

Sum vanli kann nevnast, at útróðrarbátar norðanfyri sum fyri táum árum síðani fingu eini 100 - 200 pund upp á stampin, nú mangan bert nøkur fingið um eini 25 - 50 pund upp á stampin - og enntá minni!

Havandi hesa vána støðu útróðrarmanna í huga, og at húkaveiðan ikki er nokur hóttan fyri stovnin, átti húkaveiða - og bert húkaveiða - at verið loyvd á nevndu økjum.

Annars verður vist til skriv frá avvarðandi útróðrarfelagum.

1. viðgerð 8. februar 1994. Málið varð hildið í fiskivinnunevndini, sum 4. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, tann 1. februar 1994 og eftir 1. viðgerð 8. februar 1994 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilutа og ein minnilutа.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Jógvan A. Johannessen, Henrik Old, Karl Heri Joensen, Jógvan Sundstein og Jógvan I. Olsen) vísir á, at uðaravmarkaða veiðubannið rundanfyri er sett í gildi fyri at verja gýtingarstovnin, so fiskastovnarnir kunna mennast aftur. Eisini vísir meirilutin á, at landsstýrið arbeiðir við málinum um at broyta kunngerðina, og tá landsstýrið saman við løgtingsins fiskivinnunevnd hevur heimild við kunngerð at áseta reglur um, hvussu fiskiskapurin skal fremjast á landleiðini, tekur meirilutin ikki undir við málinum og setur enki uppskot fram.

Minnilutin (Niels Pauli Danielsen) vísir á, at húkaveiðan ongan stovn oyðir, og tí tekur minnilutin undir við málinum og mælir løgtingnum til at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

2. viðgerð 21. mars 1994. Uppskotið fall við 14-0 atkvøðu.

97 Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn

Ár 1994, týsdagin 25. januar legði Tordur J. Nielsen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar.

Sum nýtt stk. 7 í § 2 verður sett:

"Stk. 6. Í tíðarskeiðnum 1. apríl 1994 til 31. mars 1995 verður inngjaldið til grunnin samsvarandi stk. 1 og 2 latið arbeiðsloysistryggingini.

§ 2.

Henda lóg fer gildi frá 1. apríl 1994.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om arbejdsmarkedspension.

§ 1.

I lagtingslov nr. 39 af 7. maj 1991 om arbejdsmarkeds pension med senere ændringer foretages følgende ændringer:

'Stk. 6. I tidsrummet 1. april 1994 til 31. marts 1995 overgår indbetalningen til fonden i henhold til stk. 1 og 2 til arbejdsløshedsforsikringen

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. april 1994

Viðmerkingar:

Í mars mánaða 1993 legði landsstýrið fyri tingið uppskot um broytingar í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

Henda broyting hevði m.a. við sær, at inngjaldið til grunnin í tíðarskeiðnum 1. apríl 1993 til 31. mars 1994 varð latið arbeiðsloysistryggingini.

Sum grundgeving fyri hesum varð frá landsstyrisins síðu sagt: "Landsstýrið heldur tó, at støðan hjá teim arbeiðsleysu er soleiðis, at neyðugt er við hesum stigi."

Tí sýnist tað løgið, at landsstýrið ikki nú vil, at avvarðandi tíðarskeið verður longt t.d. í eitt ár. Ein kann loyva sær at spyrja, um samgongan heldur, at støða teirra arbeiðsleysu er vorðin betri í árinum, sum farið er?

Nei, støða teirra arbeiðsleysu er hóttisligari enn nakrantíð, og kann tí ikki koma upp á tal at

lækka útgjaldið úr arbeiðsloysistryggingini ella heldur at stytta tíðarskeiðið fyri útgjaldið hvønn einstakan.

Upplýst hevur verið, at einar 40 mió. kr. tørva at mangla eftir verandi gongd tað, sum eftir er av 1994.

Havandi samfelagsstøðuna í huga og hvussu torvandi møguleikar eru hjá fólki at torvinna tí lívsins uppihald, kann tað als ikki góðtakast, at ALS verður tikið til gísla í eini ósemju í samgonguni. Tapararnir hon venda ney arbeiðsleysu og ramtíðar tørru!

Uppskotsstillarin hevur áður boðað frá, at hann vildi stuðla landsstýrið, um atkvøða mangladi í at fáa málið samtykt í tinginum. Eisini hevur uppskotsstillarin tikið sum grið, at mangladu fleiri atkvøður, so vildi andstøðan annars kenna sína ábyrgd og atkvøða fyri.

Orkt at ivast í, at meirilutin fyrst í tinginum at fremja broytingar, sum loyva, at inngjaldið til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn enn eitt ár verður latið arbeiðsloysistryggingini. Slík heimild ger, at ALS kemur at fáa einar 22 mió.kr.

Slík upphædd loysir ikki trupulleikarnar hjá ALS, men er ein mundandi hjálp, og við góðum vilja áttu landsstýrið - um neyðugt við hjálp frá andstøðuni - at funnið ta upphædd, sum enn kemur at mangla. Tá politiski myndugleikin ikki er fúrur fyri at økja um virksemið ella skapa fortreytir fyri øktum virksemi í landinum, so skylda vit teim arbeiðsleysu, at arbeiðsloysistryggingin, íð hvussu so er, ikki versnar.

1. viðgerð 8. februar 1994. Uppskot um at beina málið í tiðjarnevndina fall við 3-0 atkvøðum. Málið varð beint í arbeiðaramálanevndina. Burturlotið vegna samgonguslit.

98 Løgtingslóg um minstuløn til útróðrarmenn

Á ári 1994, týsdagin 25. januar leggdi Thomas Arabo, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um minstuløn til útróðrarmenn.

§ 1. Við tí endamali at tryggja luntøkur

lagtingslov om mindsteløn til hjemmefiskere.

§ 1. Med det i mål at sikre hjemmefi-

útróðrarmanna verður landsstýrinum heimilað at útgjalda minstuløn til manning á fiskiførum á útróðri á føroysku landleiðini í eini uriggjar mánaða reyndartíð frá 1. februar til 30. apríl 1994.

§ 2. Manning á fiskiførum á útróðri á føroysku landleiðini kann verða latin minstaløn til útróðrarmenn í eini 3 mánaða reyndartíð í tíðarskeiðinum 1. februar til 30. apríl 1994. Treytin fyri minstaløn til útróðrarmenn er, at fiskifarið hevur avreitt minst 15 ferðir seinastu 3 mánarnar, at manningin verður avroknað og í tali er sum vanligt er á staðnum, at øll veiða verður avreidd undir einum, og at fiskifarið avreiðir minst 25 kilo uppá mannin fyri hvønn veiðidag.

§ 3. Um manning á útróðrarfari skal koma undir skipanina við minstuløn fyri útróðrarmenn, skal bátsformaðurin fyri hvønn mánað láta Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna skrivliga fráboðan og lista yvir manning. Fráboðanin og manningarlistin skal vera Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna, undirskrivað av manning og bátsformanni, í hendi í seinasta lagi 1. dagin í mánaðanum eftanfyri er at koma undir skipanina.

§ 4. Minstaløgin til útróðrarmenn er kr. 7.500.00 um mánaðin. Um minstaløn, fiskipartur og onnur inntøka hjá útróðrarmanni samanlagt fer upp um kr. 12.725.00 mánaðin útgoldið verður fyri, verður minstaløgin minkað við sama krónutali, sum øll inntøkan fer upp um kr. 12.725.00.

§ 5. Eftir umsókn kann verða játtað avloysara ella áveggjum manni á fiskifari minstaløn í einum mánaði, um treytirnar í §§ 2 og 4 eru loknar. Útróðramaðurin verður í slíkum føri avroknaður við 1/16 av minstulønini kr. 468.75 fyri hvønn veiðidag.

skernes indtægter Landsstyret bemyndiget til at udbetale mindsteløn til mandskab på fartøjer i hjemmefiskeri i færøsk fiskerizone i en prøveperiode på tre måneder fra 1. februar til 30. april 1994.

§ 2. Til mandskab på fartøjer i hjemmefiskeri i færøsk fiskerizone kan ydes mindsteløn for hjemmefiskeri i en tre måneders prøveperiode i tidsrummet fra 1. februar til 30. april 1994. Betingelsen for udbetaling af mindsteløn til hjemmefiskere er, at fiskefartøjet har landet mindst 15 gange de sidste 3 måneder, at mandskabet bliver afregnet og i antal er som sædvane er på stedet, at fangsten bliver landet samlet, og at fiskefartøjet lander mindst 25 kilo pr. mand pr. dag.

§ 3. Hvis mandskabet på et hjemmefiskerfartøj skal komme ind i ordningen med mindsteløn for hjemmefiskere, skal bådsformanden for hver måned sende Fiskernes Lønudligningsfond skriftlig tilmelding og liste over mandskabet. Tilmelding og liste over mandskabet skal være Fiskernes Lønudligningsfond i hænde, underskrevet af mandskab og bådsformand, senest den 1. i den måned i hvilken man agter sig under ordningen.

§ 4. Mindstebeløbet for hjemmefiskere er kr. 7.500.00 om måneden. Hvis hjemmefiskerens mindsteløn, fangstandel og anden indtægt sammenlagt overstiger kr. 12.725.00 i den måned, som der skal udbetales for, reduceres mindstelønnen med samme antal kroner som hele indtægten overstiger kr. 12.725.00.

§ 5. Efter ansøgning kan bevilges afløser eller ny mand på fiskerfartøj mindsteløn i en måned hvis reglerne i § 2 og § 4 er overholdt. Hjemmefiskeren bliver i sådant tilfælde afregnet med 1/16 af mindstelønnen kr. 468.75 for hver fangstdag.

§ 6. Minstalønin til útróðrarmenn verður avroknað mánaðin eftir at hon er vunnin.

§ 7. Eingin minstiforvinningur verður digeidin eftir § 3. pkt. 2 og 3 og § 5 í løgtingslóg nr. 32 frá 27. mars 1992 um minstuløn, dagsstudning og minstaforvinning, sum broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 16. november 1992 og løgtingslóg nr. 44 frá 23. mars 1993 í tíðarskeiðinum 1. februar til 30. apríl 1994.

§ 8. Henda lóg tær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og ter úr gildi aftur 30. apríl 1994.

§ 6. Mindstelønnen til hjemmefiskere bliver afregnet måneden efter den er optjent.

§ 7. Mindsteindtægt bliver ikke udbetalt efter § 3. pkt. 2 og 3 og § 5 i lagtingslov nr. 32 fra 27. mars 1992 om mindsteløn, dagsstøtte og mindsteindtægt, som ændret i lagtingslov nr. 159 fra 16. november 1992 og lagtingslov nr. 44 fra 23. mars 1993 i perioden 1. februar til 30. april 1994.

§ 8. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort og ophæves igen 30. april 1994.

Viðmerkingar:

Landsstýrið leggur við hesum fram uppskot um royndarskipan við minstuløn fyri útróðrarmenn.

Skotin verður upp royndarskipan við minstuløn fyri útróðrarmenn fyri 3 mánaðir frá 1. februar til 30. apríl 1994. Minstalønin til útróðrarmenn verður kr. 7.500,00 um mánaðin. Minstuløn, fiskipartur smb. avrokning og onnur inntøka má samanlagt ikki vera stórri enn kr. 12.725,00 um mánaðin.

Er fiskipartur og inntøka úr aðrari vinnu ella veitingar hjá útróðrarmanni samanlagt t.d. kr. 12.001,00 mánaðin útgjaldast skal fyri, verður minstalønin kr. 725,00. Er fiskipartur og inntøka ur aðraci vinnu ella veitingar hjá útróðrarmanni samanlagt kr. 12.725,00 ella meira mánaðin útgjaldast skal fyri, verður ongin minstalon utgoldin.

Høvuðstreytin fyri minstalon til útróðrarmenn er, at bátarin hevur avreitt minst 15 ferðir seinastu triggjar mánaðirnar.

Sum avreiðingar smb. hesi lóg verða bert roknaðar tær avreiðingar fiskitarið avreiðir í minsta lagi 25 kilo uppá mannin fyri hvønn veiðidag. Hendan regla er galdandi fyri øll útróðrartør.

Talan er um eina royndarskipan í triggjar mánaðir. Landsstýrið fer síðani at umhugsa at gera skipanina varandi.

Skipanin fer yvirhøvur at verða til fyrimuns hjá smærru útróðrartørunum, teir vetrar tá tað viðrar illa. Verður skipanin gjørd varanci, eigur at verða umhugsað at seta eitt hægri avreiðingartal fyri summarmánaðirnar.

Hámark verður sett fyri útgjalding av inntøkutrygd til útróðrarmenn, soleiðis at í mesta lagi kr. 90.000,00 kunnu útgjaldast sama persóni roknað fyri alt árið. Flestu útróðrarmenn fingu í 1993 minni enn kr. 90.000,00 útgoldnar í minstatorvinningi.

1. viðgerð 1. februar 1994. Málið vard beint i fiskivinnunevndina. sum 4. mars 1994 legdi fram soljódandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. januar 1994 og eftir 1. viðgerð 1. februar 1994 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við stjóran fyri Lønjavningargrunn Skipsfiskimanna.

Uppskotið snýr seg um at seta í verk eina royndarskipan við minstulón fyri útróðrarmenn í tríggjar mánaðir, frá 1. februar 1994 til 30. apríl 1994. Nú februar mánaði er liðin, mælir nevndin til, at henda royndarskipan verður í tveir mánaðar, mars og apríl og mælir ti til, at broyta §§ 1 og 2 samsvarandi hesum.

Í § 2 verður skotið upp, at treytin fyri minstulón til útróðrarmenn er, at fiskifarið hevur avrent minst 15 ferðir seinastu tríggjar mánaðarnar. Nevndin er av teirri áskoðan, at hetta talið er ov hógt og mælir til, at talið á avreidingum verður sett til 10.

Í § 3 verður sagt, at hátsformaðurin skal lata Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna skrivliga frábodan og lista yvir manning. Í hesum sambandi verður orðið "manningarlistin" nýtt. Tá manningarlisti er skjal, ið nýtt verður í sambandi við mynstring, mælir nevndin til, at hetta orð verður broytt til "listi yvir manning". Eisini verður sagt, at frábodanin skal verða lønjavningargrunninum í hendi 1. dagin í mánaðanum, ætlanin er at koma undir skipanina. Nevndin mælir til, at fyrstu ferð skal henda frábodanin verða lønjavningargrunninum í hendi í seinasta lagi 10. mars 1994.

Nevndin er samd um at mæla til, at broyta orðingina í § 5, ið snýr seg um avloysarar, soleiðis: "Um avloysarar ella nyggjur maður kemur við á fiskifarið fyri annan mann, fráboðar hátsformaðurin Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna, hvørjar dagar viðkomandi maður skal hava minstuløn".

Eftir § 7 í lógaruppskotinum er ætlanin, at engin minstuforvinningur verður útgoldin í tíðarskeiðnum, henda lig hevur gildi. Nevndin mælir til, at útróðrarmenn skulu hava møguleika at velja, annaðhvørt teir vilja koma undir skipanina við minstuløn ella tíða minstaforvinning.

Við hesum broytingum mælir **ein samd nevnd** løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins og setir ti fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) Í § 1 verða orðini "tríggjar" broytt 1) I § 1 ændres ordene "tre" til "to" og

til "tveir" og 'februar' til "mars".

2) Í § 2 verður "3" broytt til "2", "februar" til "mars" og "15" til "10".

3) Í § 3 verður skoytt uppi ", tó fyrstu ferð í seinasta lagi 10. mars 1994.".

5) § 5 verður soljóðandi: "Um avloysari ella nyggjur maður kemur við á fiskifarið fyri annan mann, fráboðar bátsformaðurin Lønavningargrunni Skipsfiskimanna hvoriar dagar viðkomandi maður skal hava minstaløn fyri".

6) § 7 verður soljóðandi: "Útróðrar menn velja sjálvir um teir koma undir skipanina við minstaløn ella fáa minstaforvinning .

"februar" til "marts".

2) I § 2 ændres "3" til "2", "februar til "marts" og "15" til "10".

3) Ingen ændring i den danske tekst.

4) I § 3 tilføjes: ". dog første gang senest 10. marts 1994."

5) § 5 affattes således: 'Om afløser eller ny mand kommer med på fiskefartøj for anden mand meddeler bådsformanden Fiskernes Lønudligningsfond hvilke dage vedkommende mand skal have mindsteløn.

6) § 7 affattes således: 'Hjemmefiskere vælger selv om de kommer med i ordningen med mindsteløn eller far mindsteindtægt."

Í løgtingslóg nr. 32 frá 27. mars 1992 um minstaløn, dagsstudning og minstaforvinning er ásett, at treytin fyri at fáa minstaforvinning er, at inntøkan hjá viðkomandi persónai seinasto triggjar mánaðirnar ikki er størri enn galdandi minstaløn. Fiskivinnumeridin hevur kannleika um, at fiskimenn, sum hava verið mynstraðir við skipi, sum annaðhvørt er lagt eða selt, og eru farnir at rógva út, ikki hava fingið avrokningina útgoldna fyrr enn fleiri mánaðar eftir, at hýran er forvunnin. Hesir menn lúka tí ikki treytirnar at fáa minstaforvinning, tí útgoldna upphæddin verður roknað sum inntøka, tá hon verður útgoldin. Nevndin mælir tí til, at broyta lógina soleiðis, at hýran verður roknað sum inntøka í tíðarskeiðinum, hon er forvunnin. Samsvarandi hesum setir nevndin samd nevnd tí fram soljóðandi.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstaløn, dagsstudning og minstaforvinning við seinni broytingum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 32 frá 27. mars 1992 um minstaløn, dagsstudning og minstaforvinning við seinni broytingum verður gjørd hendа broyting:

Í § 3, nr. 3), litra a, verður skoytt uppí:

"inntøka, sum er forvunnin áðrenn triggja mánaðarskeiðið, verður ikki roknað uppí."

lagtingslov om ændring i lagtingslov om mindsteløn, dagsstøtte og mindsteindtægt med senere ændringer.

§ 1.

I lagtingslov nr. 32 af 27. marts 1992 om mindsteløn, dagsstøtte og mindsteindtægt med senere ændringer foretages følgende ændringer:

I § 3, nr. 3), litra a, tilføjes:

"Indtægt, som er fortjent inden tre måneds perioden, medregnes ikke."

§ 2.

Henda lög kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter, den er bekendtgjort.

Jógvan Sundstein viðmerkir, at hann tekur í fyrsta lagi undir við løgtingsmáli nr. 90/1993: Broyting í løgtingslóg um minstuløn, dagsstudning og minstaforvinning og í øðrum lagi undir við fyriliggjandi uppskoti.

Niels Pauli Danielsen viðmerkir, at hann tekur í fyrsta lagi undir við løgtingsmáli nr. 93/1993: Minstuløn til útróðrarmenn og í øðrum lagi undir við fyriliggjandi uppskoti.

2. viðgerð 4. mars 1994. Broytingaruppskotið frá fiskivinnunevndini samtykt við 27-0 atkvøðum.

3. viðgerð 4. mars 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

Lóg nr. 59 frá 24. mars 1994.

99 Broyting í løgtingslóg um ferðagjald

Ár 1994, týsdagin 1. februar legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um ferðagjald við seinni broytingum verður sett úr gildi.

§ 1.

Løgtingslóg nr. 37 frá 26. mai 1988 um ferðagjald við seinni brytingum verður avtikin.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om rejsecafgift med senere ændringer ophæves.

§ 1.

I lagtingslov nr. 37 af 26. maj 1988 om rejsecafgift med senere ændringer ophæves.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar

Við avtøku av hesi lóg missir landskassin ætlaðar 12 mió. kr. í ár í inntøkum frá ferðaavgjaldinum upp á 300 kr. fyri hvønn ferðaseðilin.

Men tá ferðaavgjaldið man kosta landskassanum meir í mistum inntøkum hjá ferðavinnuni, enn tað gevur, nevði landsbúskapurin tvaleyst tingið beinleiðis vinning av, at ferðaavgjaldið verður avtikið.

Í fyrsta lagi kann sigast, at landsfyrisitting og almennir stovnar gjalda lítitan part av flogseðlunum. Tað ferðagjaldið utlíknar seg sjálvt. Vinnuvirki, skip, handilstyritkar o.o. roknskaparskyldug, sum umboða lítitan part av flogferðafólkinum, serliga veurarbálvárið, draga ferðaútreiðslur frá skattskyldugu inntøkuni. Her er kanska longu 25-30%, t.e. 3-4 mio. kr. av ferðaavgjaldinum misdur aftur.

Sostatt er mest talan um netto inntøku í landskassan, kanska heldur 8-9 mió. kr. tilsamans, frá ferðaavgjaldinum í summarferðing loft- og sjóvegis.

Men búskapurin missir smbr. Ferðaráðið inntoku av ferðaavgjaldinum. Útlendingar aftra seg kanska at koma til Føroya, tí dýrur ferðaseðil og ferðaavgjaldið omanná verða hentari brúkt til summartrí suðurettir ella til Noregs.

Siga vit, at hvørt útlendskt ferðafólk í miðal leggur umt. 6.000 kr. eftir seg á ferð í Føroyum, ferðaseðil frokna∂ur, skulu bert 3-4.000 útlendingar fleiri vitja hagar árliga, so kastar tað umt. 20 mió. kr. av sær í brutto, harav landskassin fær 8-9 mió. kr., burturúr í skatti frá teimum, sum fáa inntøku av ferðavinnuni.

Ferðaavgjaldið, 200 kr., varð bygtest undir sosialistiska landsstyrinum 1985-89 í eini roynd at útvega landskassanum størri inntøkur til almenna nýtslu og samstundis fyri at forða fólkavinguni at ferðast uttantands. Í fjør varð ferðaavgjaldið av somu sosialistisku samgongu hækkað upp í 300 kr. Enn eitt dømi um, hvussu búskapurin sviður fyri, at sosialistiskur politikkur bert nøktar tørv áins almenna - uppá bekostning av búskapi, landi og fólki annars.

Óskara høga ferðaavgjald upp á 300 kr. skal sammetast við 120 kr. í Íslandi, 89 kr. í Kanada, 65 kr. í Danmark, 49 kr. í Írlandi, 12 kr. í Svøriki, men lond sum Grønland, Finland, Skotland, Noreg o.o. hava einki ferðaavgjald.

1. viðgerð 8. februar 1994. Málið varð beint í ídnaðarnevndina, sum 21. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 1. februar 1994 og eftir 1. viðgerð tann 8. februar beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Jacob Lindenskov og Karl Heri Joensen) vísir á løgtingsmál nr. 159/1993: Broyting í løgtingslóg um ferðagjald, sum landsstýrið hevur lagt fram, har mælt verður til at lækka ferðaavgjaldið úr 300 kr. niður í 120 kr. Meirilutin setir ti eink uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Sundstein og Finnbogi Arge) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið fall við 11-0 atkvøðum.

100 Fyrispurningar

Sí bls. 938

101 Øktir inntøkumøguleikar hjá sethúsaeigarum frá ferðavinnuni

Ár 1994, týsdagin 1. februar legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum, saman við ferðavinnuni, Húsalánsgrunninum, peningastovnunum og kommununum, at finna fram til figgingarmøguleikar, so áhugaðir sethúsaeigarar kring landið kunnu fáa høvi at seta í stand gomul sum nýggj sethús, so tey í størri mun enn nú kunnu nýtast til at leiga út til og hýsa ferðafólki.

Viðmerkingar

Uppskotið er ætlað sum ein roynd:

1. At økja um møguleikarnar hjá fólki at vinna pening úr ferðavinnuni.
2. At útvega landsbúskapinum nyggjar inntøkur frá fremmandum ferðafólki og spara landshúsarhaldinum útreiðslur við fleiri tilhøvum til innlendis ferðing.
3. At skapa arbeiði til handverkarar og tænastuveitarar í byggivinnuni.
4. At varðveita og økja virðið á sethúsamassanum kring landið, sum annars er í vanda fyri at fara fyri skeyti av frálýsing og húsavanrokt.

Uppskotið byggir á tá grundreglu, at hin einstaki sethúsaeigarin sum vant eigur og ræður yvir privatogn sini, tekur sjálvur avgerð, um hann vil nýta henda fíggjarmøguleika og ábyrgjast persónliga av teirri eyka lánbyrðu, sum hansara virðisokta sethús skulu forrenta. Men kortini er ætlað, at ferðavinnan kann fáa seravtalu við eigaran um ein part av árinum at leiga út til ferðafólk tóm sethús, sum verða gjørd í stand eftir hesi skipan. Eigarin fær inntøkuna av hesi útleigu.

Tað gerst meir og meir neyðugt við tiltøkum til at varðveita og halda viðlíka tað vaksandi talið av tómum sethúsum. 2.000 ferðafólk úr Føroyum árliga svarar til umr. 3-400 miðalstór húsarhald. So leingi landsstýrið tvíheldur um sosialistiska katastrofukósina við økjandi skattatrýsti og hækkandi kostnaðarstøði, sum føra til størri arbeiðsloysi og vaksandi frálýsing, so leingi veksur talið á sethúsum kring oyggjarnar, sum anzin standa tóm eftir tvingsilssølu, ella sum misfarast, tí eigarin hevur mist inntøkuna og hevur ikki ráð at halda tey viðlíka.

Ferðavinnan er fyri vist ein enn alt ov lítið nýtt innleggukelda fyri hitt einstaka húsarhaldið og búskapin sum heild. Vit vita av meiningaskiftingum millum útlendsk ferðafólk í Føroyum, at náttúran, ferðasamhandið, fritíðarhøvi til gongd, sukkling og keyring í vøkrum umhvørvi, stuttleikaítriv sum fiskitúrir, fuglaeygleiðing, ja enntáa ljósið og veðurlagið draga fremmanda fólk higar. Men útboðið í Føroyum av bíligari gisting, sum í Bretlandi "Bed & Breakfast" í Danmark summarhús, ella í Noreg tjaldasmiðurnar, er heldur avmarkað.

Búskaparkreppan rakar eina hardast byggivinnuna. Eingi hósasmið er longur, og samstundis verða tóm hús, ið skjótt forfalla, alt meir vanlig, ikki bert í útjaðaranum, men nú eisini inni á meginøkinum.

Vit hava helst størri bústaðaroki upp á fólkið enn tilsvar onnur lond. Við frálýsingini standa 10-túsundtals fermetrar av gólvplássi nú ónýttir. Bústaðaroki er eitt sín størsta aktiv, vit eiga, men tað má gagnnýtast. Ferðavinnan er eyðsýndur møguleiki til slíka eyðnýtslu.

Húsalánsgrunnurin og peningastovnarnir eiga støðugt vaksandi tal av útrýmdum húsum, sum forfalla. Fólk, sum eru flutt frá útplássum, men sum eiga ella hava arvað gomul hús í heimbygdini, og sum megnaðu at halda tey viðlíka í 80-árunum, hava nú ikki longur ráð til tess og mugu láta tey danka av. Vanrøkt hús niva sínamið hæði hjá eigara og hjá bygdarfólkinum.

Verða útvegir funnir fyri rímiligari fígging til at seta í stand og innrætta gomul sum nýggj sethús kring landið, verður úrslitið nógv størri úttboð av ferðahúsum til útlendskar og føroyskar gestir. Hotelgrunnurin er ikki til longur, men hann hevði kunna parafíggjað slíkt

tiltak. Húsalánsgrunnur og peningastovnar kava beinleiðis áhuga í, at hús. sum teir eiga (vónandi bert fyribils) verða hildin viðlíka í standin fyri at forfarast. Talan nyttist bert vera um nakrar fáar 10-túsund kr. fyri hvørt húsið til at gera tey eina inntøkukeldu fyri eigaran. Ferðavinnan heldur stórum tali av sethúsum uppi sum leigubús um summarið í fleiri av okkara grannalondum.. Hví ikki eisini her á landi?

Privatir eigarar av hesum sethúsum kunnu við samskipaðari útleigu ein part av árinum, við serliga summarið, gjøgnum ferðavinnuna tryggjað húsunum eina inntøku til framtíðar viðlíkahald, rentur og avdráttir. 100 kr. um dagin upp á fólkið í ferju er rimiligt. Familja ella ferðalag upp á 5 fólk kundu leigað hús fyri 4-500 kr. um samdøgrið. Í 8 vikur, juni og juli, gevur tað 60 (dagar) x 4-500 kr. = 25.300 kr. alt. Altso nóg mikið til at forrenta 200.000 kr. í lánum.

Stórn tal av sethúsum, útleigað sum ferðasmatur nakrar vikur ella mánaðir hvørt ár, hevði umframt givið nakrar dagløntir til eigaran ella fólk á staðnum fyri ferðavinnutænastur. Føroyskum kommunum verður slíki samskipað tiltak ein skattig inntøka.

Trupulleikin er figging. Samskipan millum kommunalar og landsmyndugleikar, ferðavinnuna, peningastovnarnar og sethúsaeigarar er tað, sum er neyðugt, og sum nú skortar. Eingin vandi er í hesum tíðum fyri, at sethúsaeigarar spenna seg harðari fyri við slíkum íløgulántum í sethús, enn tann eyka inntøkan av útleigu til ferðafólk kann bera.

Fingu smærri útlendsk ferðaløg, bólkar og familjur innivist í væl hildnum, fjálgum og reinum sethúsum á okkara náttúruvøkru oyggjum, leitaðu ivaleyst fleiri ferðafólk henda veg. Sum er koma hert uml. 25.000 "turistar" bigar árliga, sammett við 200.000 til Íslands (hóast ferðamannaskipið er føroyskt!). Hesir 25.000 ferðagestir máttu kunna tvífaldast, um útboðið av bíligum innivisti í góðum sethúsum var størri og betur samskipað. Harumframt høvdu føroyingar sjálvir helst gjørt meir av at ferðast kring um í egnum landi. Tað hevði skapt arbeiði og spart gjaldsjavnaðinum nógvan pening.

1. viðgerð 22. februar 1994. Málið varð beint í idnaðarnevndina. Sum 21. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 1. februar 1994 og eftir 1. viðgerð tann 22. februar 1994 beint í idnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Jacob Lindenskov, Karl Heri Joensen og Flemming Mikkelsen) setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot fólkaflokksins.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið fall við 6-0 atkvøðum.

102 Ígildissetan fyri Føroyar av lóg "om erhvervsfremme"

Ár 1994, miðvikudagin 2. februar legði Edmund Joensen, løgtingsmaður, vegna sambandsflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at landsstýrið heitir á ríkismyndugleikarnar um, at § 2. nr. 1-8. í lóg nr. 394 frá 13. juni 1990 "om erhvervsfremme" verða settar í gildi fyri Føroyar.

Viðmerkingar

Í løgtingsmáli nr. 63/1992: Ígildissetan fyri Føroyar av lóg "om erhvervsfremme" var § 2. nr. 9-10. sett í gildi í Føroyum við teirri broyting, at reglurnar um akkreditering eisini eru umfatadar av hesi ígildisseting.

Sambandsflokkurin mælir til, at § 2. nr. 1-8. verður sett í gildi fyri Føroyar. Hetta var umrott í løgtingsmáli nr. 63/1992, men tað málið umfatadi bert § 2. nr. 9-10, ið fyriskipanir, sum eru framhald av "lov om egnsudvikling").

Í løtuni eru hesar skipanir galdandi í Danmark:

Eksportfremme, iværksættelsegaranti.
Branchefremstød på eksportmarkeder.
Forstudier til internationalt samarbejde om teknologiudvikling.
Internationale licitationer.
Standardisering af fødevareindustriens udstyr.
Eksportnetværk.
Eksportstipendiater.
Iværksætterprogrammet.
FØTEK 2.
Industriel udnyttelse af miljøteknologi.
Underleverandører.

Viden og kvalitet.
Isbryderprojektet.

Mæli verður til at fullfíggja lógargrundarlagið soleiðis, at tað í Føroyum er møguligt at fremja vinnutiltok við heimild í nevndu lógarreglu. Ú flokkurin metir hesa reglu at vera eitt gott ambod fyri føroyska vinnulívið.

1. viðgerð 8. februar 1994. Málið verð heint í idnaðarnevndina. sum 21. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av sambandsflokkinum tann 2. februar 1994 og eftir 1. viðgerð 8. februar 1994 eitt í idnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjort málið.

Í uppskotinum verður mælt til, at løgtingið samtykkir, at landsstýrið heitur á ríkisstýrisins leikarnar um, at § 2. nr. 1-8. í lóg nr. 394 frá 13. juni 1990 "om erhvervsfremme" verða settar í gildi fyri Føroyar.

Føroya løgting viðgjørt frammanfyrinevndu donsku lóg í sambandi við løgtingsmál nr. 63/1992, tá løgtingið samtykti at seta teir partar av lógini í gildi fyri Føroyar, ið komu í staðin fyri tá lóggávu, sum var galdandi í Føroyum, t.e. "Lov om mål og vægt (metrologi)" (burtursæð frá reglunum um "målere og vejere", sum er yvirtikið málsøkið), §§ 7a og 8 í "Lov om teknologisk service", "Lov om fondet til fremme af teknisk og industriel udvikling", "Lov om egnsudvikling", "Lov om statsligt indskud i Finansieringsinstituttet for Industri og Håndværk A/S med henblik på udlån til handværk og mindre industri", "Lov om statsligt indskud i Finansieringsinstituttet for Industri og Håndværk A/S" og § 11 í "Lov om Danmarks erhvervsfond".

Landsstýrið royndi longu tá at fáa reglurnar í § 2. nr. 1-8. tiknar við í lógaruppskotið, men hetta visti seg ikki gjørligt, uttan at seinka ollum málinum óneyðuga nógv, og fyri Heilsufrøðiligt Starvsstovuna hevði tað týdning at fáa uppskotsins lógarbroyting gjøgnumførda, tí við teirri broyting, at reglurnar um akkreditering eisini vórðu umfataðar.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið varð fort fram, at "Tað kann umhugsast, um landsstýrið ikki skal mæla til, at allar 10 t.e. eisini 1-8 verða settar í gildi." og landsstýrið endaði síni viðmerkingar við at "Fyrivarni kann møguliga verða tikið fyri at venda aftur til spurningin um eisini at seta í gildi § 2, nr. 1-8."

Landsstýrið arbeiðir sostatt við málinum. Tað skal viðmerkjast, at av tí at frammanfyri nevnda § 2, nr. 1-8. ikki hava verið galdandi í Føroyum, hevur verið neyðugt at taka málið upp við Forsøgsmálaráðið. Landsstýrið roknar við, at tað í næstum kann leggja fullfíggjað uppskot fyri løgtingið um ígildisseting av vinnufremjandi donskum skipanum saman við frágreiðing um hvussu tær virka og hvør ætlanin við teimum er.

Av ti. at uppskotið er í samsvar við tað, sum landsstýrið arbeiðir við, tekur **ein samd nevnd** undir við málinum.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

103 Løgtingslóg um tinglýsingargjøld

Ár 1994, týsdagin 8. februar legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

løgtingslóg um tinglýsingargjøld v.m.

§ 1. Fyri tinglýsing verður rindað eitt gjald, sum er 100 kr.

§ 2. Gjaldið verður rindað fyri eitthvørt skjal, ið verður fráboðað til tinglýsing.

§ 3. Verður eitt skjal, ið ikki kemur undir tað í § 5, stk. 3 nevnda fori, víst burtur, verður nýtt gjald ikki rindað, um skjalið verður fráboðað til tinglýsing av nýggjum innan 3 mánaðir roknað frá fyrstu fráboðanini til tinglýsing.

§ 4. Tinglýsing er ókeypis av
1) adressuoroyingum,
2) myndugleikatøku og løgverjumálum, jbr. § 48 í løgtingslóg um tinglýsing,
3) fráboðanum, sum nevndar í § 13 í løgtingslóg um tinglýsing,
4) áheitan um búskilnað, jbr. § 43 í lóg um rættvirknað hjúnalagsins,
5) sjálvræðisfrátøka sambært § 66 í lóg

lagtingslov om tinglysningsafgifter m.v.

§ 1. For tinglysning svares en afgift på 100 kr.

§ 2. Afgiften svares for ethvert dokument, som anmeldes til tinglysning.

§ 3. Afvises et dokument uden for det i § 5, stk. 3 nævnte tilfælde, svares ikke ny afgift, såfremt dokumentet anmeldes til tinglysning på ny inden 3 måneder regnet fra den første anmeldelse til tinglysning.

§ 4. Afgiftsfri er tinglysning af:
1) adresseændringer,
2) umyndiggørelse og lavværgemål jf. lagtingslov om tinglysning § 48,
3) meddelelser som nævnt i lagtingslov om tinglysning § 13,
4) begæring om bosondring, jf. § 43 i lov om ægteskabets retsvirkninger,
5) rådighedsfratagelse i henhold til § 66

um skifti av deyðsbúgvi og felagsbúgvi og
6) sjálvræðisfrátøka sambært § 26 í konkurslógini.

Stk. 2. Ókeypis er haraftrat áheitan um:
1) avlýsing.
2) avtøku av rættarvidmerkingum.
3) freistarleingjan ella endaliga innføring í tingbókina av einum skjali, sum er tinglýst við freist, og
4) striking av rættindum, sum ikki hava fingið fulnað við tvingsilssølu, jbr. § 581 í rættargangslógini.

§ 5. Gjaldið fellur til gjaldingar, tá skjalið verður tráboðað til tinglýsing.
Stk. 2. Gjaldið verður rindað við at skjalið verður stemplað við tinglýsingarskrivstovunnar kassa.
Stk. 3. Verður gjaldið ikki goldið samstundis við tráboðarina, verður skjalið burturvíst frá dagbókini. Um so er, fellur gjaldið burtur.

§ 6. Fyri váttanir, avskriftir, útskriftir, fotoavrit ella líknandi, ið tinglýsingarskrivstovan ger, verða goldnar 50 kr.

§ 7. Gjøldini falla til tann myndugleika, ið umsitur tinglýsingina.

§ 8. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. Samstundis fara úr gildi §§ 28-29 og §§ 31-33 í "Sportelreglement for rettens betjente paa Færøerne" frá 30. mars 1836.

i lov om skifte af dødsbo og fællesbo og
6) rådighedsfratagelse efter konkurslovens § 26.

Stk. 2. Afgiftsfri er endvidere begæring om:
1) aflysning,
2) ophævelse af retsanmærkninger,
3) fristforlængelse eller endelig indførelse i tingbogen af et dokument, som er tinglyst med frist, og
4) udslettelse af rettigheder, som ikke har opnået dækning ved tvangsauktion, jf. retsplejelovens § 581.

§ 5. Afgiften forfalder til betaling, når dokumentet anmeldes til tinglysning.
Stk. 2. Afgiften erlægges ved at dokumentet afstemples ved tinglysningskontorets kasse.
Stk. 3. Betales afgiften ikke samtidig med anmeldelsen, afvises dokumentet fra dagbogen. I så fald bortfalder afgiften.

§ 6. For attester, afskrifter, udskrifter, fotokopier eller lignende, der udfærdiges af tinglysningskontoret svares 50 kr.

§ 7. Afgifterne tilfalder den myndighed, der administrerer tinglysningen.

§ 8. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.
Stk. 2. Samtidig ophæves §§ 28-29 og §§ 31-33 i Sportelreglement for rettens betjente paa Færøerne af 30. marts 1836.

Viðmerkingar:

Við skrivi dagfest 22. juli 1993 heitti Sorinskrivarin á landsstýrið um at broyta gjaldið fyri váttanir úr tingbókini.

Gjaldið fyri váttanir úr tingbókini er ásett í "Sportelreglement for rettens betjente paa Færøerne" frá 30. mars 1836, og er 1,33 kr. Hetta gjald metur Sorinskrivarin er alt ov lítið, og skjýtur tí upp, at gjaldið verður ásett til 100 kr.

Í staðin fyri at gera broytingar í "Sportelreglementet" metti landsstýrið, at rættari hevði verið

at gjørt allar reglurnar um tinglýsingargjøldini av nýggjum, og at "Sportelreglementet" í sini heild áttu at verið sett úr gildi.

Hetta sjónarmið varð lagt fyri Sorinskrivaran, og hevur hann tikið undir við tí og mælt til, at gjøldini verða ásett við lóg, ið hann hevur gjørt uppskot til og sent landsstýrinum.

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja lóg um tinglýsingargjøld.

1. viðgerð 17. februar 1994. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 27. apríl legði fram søljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 8. februar 1994 og eftir 1. viðgerð 17. februar 1994 beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirluta og ein minnaluta.

Meirlutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen, Karl Heri Joensen og Flemming Mikkelsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg og Tórður J. Niclasen) fevnir fram:

Nú búskaparkreppan herjar Føroyar, er ikki rætt at hækka kostnaðarstøðið, tí tað serliga eru tey, ið ringast eru fyri, ið noydast at gera nýtt slag av tinglýsingum (umlegging av sethúsalánum v.m.). Út frá hesum heldur minnilutin, at verandi gjøld eiga ikki at verða hækkað, og mælir tí frá at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 28. apríl 1994. Samtykt at beina málið til 3. viðgerð við 18-0 atkvøðum.

3. viðgerð 9. mai 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 17-5 atkvøðum.

FL jnr. 624-7/93.

Lóg nr. 76 frá 17. mai 1994.

104 Umlegging av skuldini hjá kommununum

Ár 1994, hósdagin 17. februar legði Niels Pauli Danielsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk

U p p s k o t

til

samtyktar

ÁLAGT VERÐUR LANDSSTÝRINUM AT FÁA UMLAGT SKULDINA HJÁ KOMMUNUNUM GJØGNUM ALMENNU PENINGASTOVNARNAR (bankarnar, tryggingarfelagini, gjaldstovuna) og taka upp samráðingar við donsku stjórnina um útlendska partin av skuldini, so at kommunurnar fáa pengarnar, sum hald er lagt á, og goldið starvsfólkum sínum løn og møguleika fyri at halda dagligu skyldur sínar sum renovatión, ljós, lendingar, vegir, kirkjugarðar v.m.

Viðmerkingar

Samlaða skuldin hjá føroysku kommununum var 31. desember 1992 kr. 1.7 mia. netto. Tá er skuldin hjá IRF, SEV, KOB og Tórshavnar Havn ikki tikin við. Av tí samlaða kommunala skuldini up á 1.7 mia. kr. eru 765 mió. kr. uttanlandsskuld (450 mió. real- og kommunukreditlán). Harumframt bøvdu IRF, SEV, KOB og Tórshavnar Havn 400 mió. kr. í uttanlandsskuld.

Við teirri minkandi inntøkuni hjá fólki og skattagrundalagnum í kommununum er tað sera trupult hjá kommununum at fáa so mikið av inntøku, at tær kunnu klára allar skyldurnar.

Vit hava tí fleiri kommunur, sum eru farnar í gjaldsstoðg eina tíð. Argja kommuna var ein teirra, ið fekk loyst upp fyri teimum ringastu trupulleikunum hjá sær við at leggja saman við Tórshavnar kommunu. Ein onnur er Klaksvíkar kommuna, sum ikki fekk goldið starvsfólkum sínum løn teir seinastu tveir mánaðirnar, tí at "transportur" upp á 5.2 mió. kr. varð eftirhildin á Føroya gjaldstova. Føroya Banki vil ikki sleppa hesum penginum, sjálvt um fortreytirnar fyri transportinum vóru burtur, sum kommunan segði.

Síðan eru samráðingar fingnar í lag millum Føroya Banka og Klaksvíkar kommunu um eina nýggja avtalu. Samlaða skuldin hjá Klaksvíkar kommunu er 190 mió. kr., harav einar 80 mió. kr. eru uttanlandslán. Gamla avtalan millum Føroya Banka og Klaksvíkar kommunu álegði kommununi frá 1. januar 1994 at gjalda bankanum 3 mió. kr. hvønn mánaða. Tá skattainntøkan t.d. fyri januar 94 hjá Klaksvíkar kommunu ikki var meira enn 4.4 mió. kr., og landskassin tók 1 mió. kr. av fyri millum rokning (almannamál v.m.), vóru bara 400 túsund kr. eftir til at gjalda øðrum lánsgevarum, løn til starvsfólk, renovatión v.m.

Í øllum kommununum er tað trupult at steppa undir nýgerðum. Fígging fæst ongin, og summar av hesum nýgerðum kunnu ikki sleðga sum t.d. kirkjugarðurin, ið onkur kommuna neyðist at viðka, tí tann, sum er, er fullur.

Samtykta lógin um skattaprosentið hjá kommununum og nýggi kreppulánsgrannurin loysir ikki trupulleikarnar hjá kommununum, men nógv hendir á, at kommunurnar tvørturímóti í nýggjum samráðingum við peningastovnarnar standa verri í dag, eftir at landsstýrið hevur hækkað skattaprosentið hjá teimum flestu kommununum.

Heldur ikki nýggi kreppulánsgrunnurin sýnist vera nøkur loysn fyri kommunurnar, tí ikki sleppa undan gjaldførishalli og øktari skuld.

Tí er neyðugt við eini heildarsanering fyri kommunurnar, sum landsstýrið, ið einsamalt eigur bankarnar í Føroyum, gjaldstovuna og tryggingarmonopolið, ma geva hesum greið boð um at fáa sett í verk og biðja donsku stjórnina um at hjálpa við til, tá ið her eisini er talan um skuld til útlendskar (danskar) peningastovnar, sum føroysku kommunurnar á sama hátt sum landskassin hava trupult við at gjalda aftur.

1. viðgerð 18. februar 1994. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 18. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 17. februar 1994 og eftir 1. viðgerð 18. februar 1994 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og vísir til avgreidda løgtingsmálið nr. 27/1993 um løgtingslóg um ásetan av kommunuskattaprosentu og um kommunalan kreppuláns- og veðhaldsgrunn v.m.

Vísir verður eisini til verandi samráðingar millum kommunurnar, bankarnar og landsstýrið um hesar spurningar.

Nevndin tekur ikki undir við fyriliggjandi uppskoti.

2. viðgerð 22. mars 1994. Uppskotið fall við 2-3 atkvøðum.

105 Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1994

Ár 1994, týsdagin 8. februar legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið hjáløgdu avtalu frá 6. januar 1994 Føroyar og Noreg millum um sínámillum fiskirættindi í 1994.

Viðmerkingar:

Váttaða frásøgnin frá fundinum millum føroyskar og norskar myndugleikar í Bergen 9.- 10. desember 1993 um sínámillum fiskirættindi í 1994 er løgd hjá.

Ikki bar til at semjast um avtaluna í Bergen 9.- 10. desember 1993. Ymisk mál skiltu partarnar, sum neyðugt var at umroða við politisku myndugleikarnar, og tískil varð avtalan ikki undirskrivað fyrr enn 6. januar 1994.

Viðvíkjandi fyritreytunum fyri samráðingunum um kvotur norðanfyri 62 gr. n. br. verður vist til løgtingsmálið um skipan millum Føroyar og Russland um sínámillum fiskirættindi í 1994

Samráðingarnar við Noreg 9.- 10. desember 1993.
Føroyski parturin ynskti at fáa sín part í økingini í TAC'num fyri tosk og hýsu í Barentshavinum. Tað visti seg, at norðmenn ikki vildu geva so nógv, og orsøkin verður mett at vera, at vit eisini í 1994 skuldu revsast fyri skuldsetingarnar um ovfisking í 1992.

Aftanfyri ynskti Noreg eina kvotu at veiða svartkalva og havtasku við gørmum undir Føroyum. Føroyska upsa-kvotan í Norðsjónum varð sett niður, av tí at tað fyri fyrstu ferð hevði verið neyðugt hjá Noregi at stevga upsafiskiskapinum, sunnanfyri 62°.

Hetta vóru týðandi mál, og partarnir skiltust, uttan at semja var funnin. Um ársskiftið varð eitt nýtt uppskot lagt fram, sum báðir partar kundu góðtaka, og avtalan varð undirskrivað 6. januar 1994.

Samráðingarúrslit:
Úrslitið gjørdist, at føroyska toskakvotan í norskum sjógvi í 1994 verður 3.100 tons, og er kvotan økt 1.100 tons. Hetta er á leið økingin í TAC'num. Yvirflytingin frá russiskum sjógvi er væl størri enn í 1993, 2.400 tons, og er hetta gjørt fyri at geva línubátunum part av kvotuni.

Svalbard er ikki beinleiðis við í sáttmálanum, har fáa Føroyar eitt ávist prosent av TAC'num fyri tosk. Í 1993 var toskakvotan við Svalbard 650 tons, í 1994 er hon 910 tons. Rækjudagatalið er óbroytt.

Eingin lodnuveiða er loyvd í Barentshavinum í 1994. Í 1993 var føroyska kvotan 9.300 tons.

Upsakvotan í Norðsjónum verð sett niður í 2.000 tons úr 2.800 tonsum í 1993. Makrelkvotan er økt samsvarandi økingini í TAC'num fyri vestanmakrelin, 740 tons, og er nú 7.740 tons.

Noreg fekk somu botnfiskakvotu við Føroyar, 5.500 tons. Umframt hetta fær Noreg loyvi til roynd arveiðu eftir svartkalva og havtasku, svartkalvi í mesta lagi 500 tons og havtaska í mesta lagi 100 tons.

Hjálagt er yvirlit yvir føroysku og norsku kvotarnar 1990-1994.
Talið av fiskiloyvum er óbroytt.

1. viðgerð 17. februar 1994. Málið verð beint í marknaðarnevndina, sum í mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 8. februar 1994 og eftir 1. viðgerð 17. februar 1994 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og **er samd** um at mæla tinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 21. mars 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

FL jnr. 1555/1990.

106 Avtøka av oljugjaldinum

Ár 1994, týsdagin 8. februar legði Niels Pauli Danielsen, løgtingsmaður vegna kristiliga fólkaflokkin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju.

§ 1. Løgtingslóg nr. 179 frá 18. december 1992 um serligt avgjald á brennioljju verður sett úr gildi.

§ 2. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er lýst.

lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om særlig afgift på brændselsolie.

§ 1. Lagtingslov nr. 179 af den 18. december 1992 om særlig afgift på brændselsolie ophæves.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar

Øllum er kunnugt, at húsarhaldini og heimin eru illa tyrn í hesum ringu tíðunum, har tleir familjur noydast úr húsum sínum. Skyldurnar eru ov tungar, og tey klára ikki at svára hvørjum sítt. Nakrar familjur stinga í sekkin og flyta av landinum, tí at somdirnar eru fregari eitt nú í Danmork.

Tí er átrokandi, at lógirnar verða broyttar, so at tað alfur gerst lættari hjá fólki at fáa endarnar at røkka saman. Avgjalds- og skattatrýstið, sum núverandi landsstýrið eins og tað undanfarna hevur lagt á føroyingar, er vorðið alt ov stórt. Fólk kunnu ikki liva av bara at gjalda inn í landskassan.

Eitt av teimum avgjøldum, sum nú bara fer í tann bottleysa landskassa, men sum var ætlað til annað, tá ið lógin á fyrsta sinn varð sett úgildi, er tað serstaka avgjaldið á brennioliu. Henda lóg varð fyrstu ferð samtykt og lýst í 1986.

Tá varð hon ætlað at gera oljuprísin meiri javnan. Tá ið oljuprísurin var lágur, fór oljugjaldið upp, og tá ið oljuprisurin var hægri, fór avgjaldið niður. Haraftrat varð oljugjaldið alt sett í ein serligan oljugrunn, sum hevði pengarnir standandi uttanlands fyri at minka um tann bogva peningin, sum tá var í umfari í føroyska samfelagnum, og sum ekki vikraemið, ið frammanundan var ov stórt.

Hesar fyritreytir eru fullkomiliga burtur nú, og oljugrunnurin er avtikin.

Tað, sum inn kemur, fer alt óskert í landskassan.

Landsstýrið hjá fólkaflokkinum og javnaðarflokkinum samtykti í 1992 at leggja mvg á allar vørur, eisini olju, sum í dag er hækkað til 25%. Harumframt samtyktu teir eisini at hækka oljuavgjaldið úr 85 oyru til 95 oyru. Gjaldið fyri tungolju varð tá tikið av, sum lætt: vøl um

hjá stór fyritøkum, ið framleiða til útflutnings og nýtslu hjá okkkum sjálvum.

Upprunaliga varð oljuavgjaldið í 1986 sett til 70 oyru fyri hvønn lítur.

Nú er stundin komin til, at eisin húsarhaldini fáa ein leiva. Tað er neyðugt fyri at vera heimini og familjurnar. Í 1993 fekk landskassin 86 mió. inn í oljuavgjaldi. Í 1994 er roknað við 80 mió. kr., sum tað má bera til at spara í almennu umsitingini í staðin fyri.

1. viðgerð 17. februar 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 27. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 2. februar 1994 og eftir 1. viðgerð 17. februar 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og vísir til løgtingsmál nr. 65/1993: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. Nevndin sær ikki uppskot fram, har málið er avgreitt.

2. viðgerð 28. apríl 1994. Uppskotið fall við 1-0 atkvøðum.

107 Stytting av viðgerðartíðini hjá kærunevndini í almannamálum

Ár 1994, týsdagin 8. februar legði Niels Pauli Danielsen, løgtingsmaður, vegna kristiligu fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at stytta viðgerðartíðina hjá Kærunevndini í almannamálum, so at fólk fáa svar skjótast gjørligt og ikki noyðast at bíða 6 mánaðir eftir, at ummælið er fingið frá Almannastovuni.

Viðmerkingar

Tá ið Kærunevndin í almannamálum við logtingslóg nr. 47 frá 23. mars 1993 varð sett á stovn, varð hildið at hetta fór at bøta um viðurskiftini hjá teimum, ið vóru mistnøgd um viðgerðina á Almannastovuni, og stytta um bíðitíðina eftir svari úr landsstýrinum, tá ið kæra varð.

Kærunevndin í almannamálum fekk sjálvstøðuga skrivstovu, og landsstýrið setti fólk við løgfrøðiligum embætisprógvi sum fastan skrivara hjá Kærunevndini, ið annars fær tá neyðugu skrivstovutænastuna frá landsskrivstovuni.

Men brøvini, ið fólk fáa frá Kærunevndini, upplýsa, at avgerð verður ikki tikin í kærumálum fyrrenn 6 mánaðir eftir, at ummæli til kæruna er komið frá Almannastovuni. Tað kann taka sína tíð.

Tá ið tað snýr seg um kærumál innan almenna forsorg, er tað átrokandi, at skjótt verður borið at, tí at fólk eru í neyð.

Tey kunnu illa bíða ½ ár ella longur eftir svari uppá kæru, sendar eru.

Tá ið landsstýrið var kærustovnur, eydnaðist tað við hvørt í sovordnum málum at bera skjótt at. Hesin møguleiki er nú burtur, um Kærunevndin ikki broytir mannagongd. Tí má landsstýrið loysa hesar trupulleikarnar hjá tí alsamt vaksandi tali av fólkum, ið kemur illa fyri og er mistnøgt við avgerðirnar hjá Almannastovuni.

1. viðgerð 17. februar 1994. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina. Burturdottið vegna sungongutslit.

108 Samráðingar um tollsamgongu

Ár 1993, týsdagin 8. februar legði Svend Aage Ellefsen, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum

1. **at taka upp samráðingar við Europeiska Samveldið (ES) um tollsamgongumøguleikar millum Føroya og ES**

2. **at taka upp samrøður við grønlendska landsstýrið og íslendsku stjórnina, um møguleika eru fyri, at øll trý londini í útnorði í felag samráðast um tollsamgongu.**

Viðmerkingar

Í seinnu helvt av áttatiárunum segði EF upp handilsskipanina, sum galdandi hevði verið millum Føroyar og EF síðani 1974.

Eftir at hava umhugsað teir tríggjar møguleikarnar fyri framhaldandi samstarvi, EF-limaskap, tollsamgongu ella fríhandilsavtalu, samdust allir politisku flokkarnir á løgtingi um at áleggja tøroysku og donsku samráðingarfólkunum at samráðast um eina fríhandilsavtalu.

Samráðingarúrslitið, ið er fríhandilsavtala við avmarkingum, varð lagt fyri løgtingið og samtykt at koma í gildi 1. januar 1992.

Umframt at loft og kvotur í nýggju avtaluni eru til ampa fyri útlutningin m.a. av føroyskum alifiski, kennast reglurnar um triðjalandsuppruna á rávøruni hjá fiskiídnaðinum darvandi fyri eini víðari menning av flakaframleiðslu úr innfluttum fiski.

Nú alt bendir á, at bæði Noreg, Svøríki og Finland fara upp í ES (umframt Eysturríki), og serstakliga Noreg soleiðis fær fyrimunir fyri sínum fiskaútflutningi, er væntandi, at kappingarstøða okkara gerst uppaftur verri enn frammanundan.

Sum kunnugt verður frá øðrum politiskum flokki (sambandsflokkinum) dúgliga róð upp undir, at Føroyar skulu innlimast í sjálvt samveldið (sí løgtingsmál nr. 57/1993: Samráðingar við EF um treytir fyri limaskapi).

Av fleiri tungtvegandi orsøkum ráða vit í fólkatlokkinum staðiliga frá innliman.

Fyri tað fyrsta er stjórnarskipan okkara so háttað, at vit sum partur av danska ríkinum onga

ávirkan fáa innan samveldið og missa mest alla ávirkan á egin viðurskifti, um Føroyar verða innlimaðar í ES.

Fyri tað næsta er politikkurin hjá ES á fiskivinnuøkinum skipaður á ein hátt, sum hevði komið okkum púrt aftur um brekku, um vit gjørdust partur av ES.

Fyri tað triðja er nógv, sum bendir á, at vit tá eisini missa ávirkan á ta oljuvinnu, sum vónandi fer at taka seg upp innan búskaparøki okkara í næstu framtíð.

Eftir fólkafloksins hugsan eiga vit tí heldur at stevna móti eini skipan, sum kann geva okkum flestar av fyimunum við innliman, men kortini varðveita rætt okkara at taka avgerð í egnum viðurskiftum.

Ein tollsamgonga kann burturtaka vansarnar við triðjalandsrávøruni, og hon kann geva okkum somu kappingarmøgnleikar, sum limalondini hava viðvíkjandi sølu av alifiski og øðrum útflutningi. Uttan iva kann hon eisini geva okkum fyrimunir viðvíkjandi arbeiðs- og útbúgvingarmøguleikum o.ø.l. í ES-londum.

Á ársfundinum hjá Tingmannaráð Útnorðurs í juni í fjør varð av føroysku sendinevndini framlagt uppskot um, at útnorðulondini í felag skuldu kann ymisk viðurskifti eini tollsamgongu viðvíkjandi.

Hetta uppskotið vann tulla undirtøku í ráðnum.

Tí verður skotið upp, at landsstýrið tekur upp hendan táttin í sambandi við føroysku samráðingarnar við ES, og tekur upp samrøður við politisku leiðslurnar í hinum báðum londunum í útnorði.

Við atliti til, at oyggin Mann, ið hevur líknandi sjálvstýri innan bretska samveldið, sum Føroyar innan danska kongaríkið, hevur tollsamgonguskipan við ES, átti verið gjørligt hjá okkum, uttan ov harðar treytir at umskipa okkara handilsavtalu til tollsamgongu.

Eyðsýnt er, at báðir partar undir samráðingunum fara at seta krøv, hvør móti øðrum.

Fólkaflokkurin metir skilagott at kanna, hvørjar treytir, ES setir Føroyum í sambandi við eina tollsamgonguavtalu.

1. viðgerð 22. februar 1994. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 24. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 8. februar 1993 og eftir 1. viðgerð 22. februar 1993 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Hergeir Nielsen. Sverre Midjord. Heini Johansen og Helena Dam á Neystabø) vísir á, at landsstýrið er í samráðingum um ábøtur á handilssáttmálan, og at løgtingið júst hevur samtykt at heita á landsstýrið um at fremja rekommandatión frá Tingmannaráð Útnorðurs um felagskanning av tollsamgongu.

Ein minniluti (Olaf Olsen og Birgir Danielsen) tekur undir við uppskotinum og mælir til at samtykkja tað.

Ein annar minniluti (Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við málinum og vísir á tingmál nr. 57/93: Samráðingar við EF um treytir fyri limaskapi.

2. viðgerð 7. apríl 1994. Uppskotini fullu bæði við 8-0 atkvøðum.

109 Lívstrygging til øll

Ár 1994, týsdagin 15. februar legði Niels Pauli Danielsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt í staðin fyri lógina um arbeiðsmarknaðareftirløn at fáa sett í verk eina lívstrygging til øll við einum grundgjaldi, sum landskassin rindar Føroya Lívstrygging, og sum einstaklingar ella bólkar í samfelagnum eftir ynski kunnu hækka, til útgjaldingar í seinasta lagi við pensjónsaldur.

Viðmerkingar

Nú, ið neyðugt tykist at vera, at inngjaldið til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, o.u. 23 mió., eisini eftir 1. apríl noyðisi at fara til arbeiðsloysisgrunnin fyri at hjálpa um figgjarstøðuna hjá hesum grunni, tekur spurningur seg upp av nýggjum, hvussu vit tryggja pensjónistunum ískoyti til fólkapensjónina, sum neyðugt verður, um pensjónisturin skal hava nakran møguleika at klára seg í framtíðini.

Tann besti og ódýrasti hátturin er at hækka sjálva pensjónina. Tað krevur onga eyka umsiting at gera hetta, men ivingarsamt er, um myndugleikarnir fáast til at gera hetta.

Heldur ikki ber til, sum nú er, at tyngja vinnulívið við meiri avgjøldum. Tvørturímóti er neyðugt at taka nógv av teimum avgjøldum av, sum landsstýrið hjá fólkaflokkinum og javnaðarflokkinum díkti bæði vinnulív og fólk undir í, og sum núverandi landsstýrisflokkar tíverri heldur ikki tykjast hava nakran hug til at broyta fyri at fáa gongd á aftur í samfelagnum. Tí verður neyðugt at ganga aðrar vegir.

Ein av hesum er tann, sum Kristiligi fólkaflokkurin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokkur longu fyri 5 árum síðan vísti á, nevniliga at hitt almenna teknar lívstrygging fyri allar borgarar í Føroya Lívstrygging og samtíðis gevur tí einstaka ella bólkum, hann er uppií, møguleika at hækka tryggingina við egnum inngjaldi. Nøkur av fakfeløgunum hava longu fyri langari tíð síðan teknað limum sínum tílíkar tryggingar, sum er komið sera væl við hjá limunum.

Í løtuni veðheldur landsstýrið fyri lívstryggingarnar í Føroya Lívstrygging, sum er ein skipan, ið danska stjórnin sigst hava kravt burtur, og sum nýggja tryggingarlógin eisini leggur upp til skal hvørva, men tað kann su bara fyri tær nýggju tryggingarnar, ið teknaðar verða. Tær gomlu halda fram og hava sítt landskassaveðhald. Hetta er o.u. 600 mió. kr. í løtuni.

Við at lata Føroya Lívstrygging vera við til at tryggja allar borgarar landsins móti einum ávísum almennum gjaldi og halda møguleikan opnan fyri tí einstaka einsamallan ella saman við starvsfeløgum at hækka hesa trygging, gera vit tað nógv tryggari hjá øllum pensiónistum og lætta um skyldurnar, lagdar eru á vinnulívið. Samstundis stimbrar hetta uppsparingarhugin í landinum.

1. viðgerð 22. februar 1994. Málið varð beint í ídnaðarnevndina, sum 21. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 15. februar 1994 og eftir 1. viðgerð tann 22. februar 1994 beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og setir eingi uppskot fram. Nevndin vísir annars á tingmálini nr. 69/1993: Tryggingarlóggávan, nr. 70/1993: Broytingar í tryggingaravtalulógini og nr. 149/1993: Umskipan av Føroya Lívstrygging til partafelag, sum eru til viðgerðar í ídnaðarnevndini.

Jógvan Sundstein vísir eisini í løgtingsmál nr. 118/1993: Nýggj fólkatrygging.

22. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið fall við 1-0 atkvøðu.

110 Samráðingar við donsku stjórnina

Ár 1994, týsdagin 15. februar legði Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Við atliti til at bøta um støðu teirra arbeiðsleysu verður álagt landsstýrinum beinanvegin at taka upp nýggjar samráðingar við donsku stjórnina.

Viðmerkingar:

Í avtalum, gjørdar við donsku stjórnina sæst, at arbeiðsloysisskipanin hevur verið viðgjørd.

Í avtaluni frá 1. februar 1993 (samtykt við 20 atkvøðum á tingi) verður m.a. sagt: "Landsstyret har overfor den danske regering tilkendegivet, at følgende yderligere initiativer er taget eller vil blive taget:

- Tilpasning af arbejdsløshedsforsikringsordningen, så der bliver balance mellem udgifter og indtægter."

Í avtaluni frá 12. oktober 1993 verður í Protokollatinum m.a. undir pkt. b sagt: "I aftalen fra 1. februar 1993 konstaterede landsstyret at: Arbejdsløshedsforsikringsordningen tilpasses, så der er balance mellem udgifter og indtægter. Landsstyret fastholder dette i 1994".

Á vári 1993 var arbeiðsloysisskipanin fíggjarliga illa fyri og legði landsstýrið fyri tingið uppskot um broytingar í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn. Henda broyting hevði m.a. við sær, at inngjaldið til grunnin í tíðarskeiðnum 1. apríl 1993 til 31. mars 1994 varð latið arbeiðsloysistryggingini.

Sum grundgeving fyri hesum varð frá landsstýrinum (Javnaðar- og Fólkaflokkurin) sagt, at "Landsstýrið heldur tó, at støðan hjá teim arbeiðsleysu er soleiðis, at neyðugt er við hesum stigi".

Nú er so arbeiðsloysisskipanin aftur komin í fíggjarliga trongstøðu, og hóast stýrið fyri skipanina einmælt hevur víst á gongdar leiðir, so vil landsstýrið NÚ ikki hoyra talan um, at inngjaldið frá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum í eitt ár afturat verður latið arbeiðsloysisskipanini.

Her tykist sum politisk taktisk manøvra í einum valári vigar tyngri enn støða teirra arbeiðsleysu og at fremja loysnir líknandi teim, sum bert fyri ári síðan til fulnar vórðu góðtiknar og settar í verk av teim somu, sum í dag nýta allar hugsandi grundgevingar fyri ikki at loyva meirilutanum á tingi at taka avgerðir.

Støða teirra arbeiðsleysu er í dag munandi verri enn, tá avtalan við donsku stjórnina 1.

februar 1993 varð undirskrivað, og kann uppskotsstillarin taka undir við sjónarmiðum verkfalsins, har hesi í skrivi til løgtingið 29.01.1994 m.a. siga: "Feløgini mega tíanverri sanna, at landsstýrið og løgtingið hava hvørki víst vilja ella evni til at skipa soleiðis fyri, at teim arbeiðsleysu verður tryggjað sømulig kor, og tær skerjingar, sum politisku myndugleikarnir nú hava ætlanir um at fremja, fara at gera støðuna hjá teim arbeiðsleysu heilt vónleysa, og verður Arbeiðsloysisskipanin nú bert eitt eiti".

Hetta eigur danska stjórnin at fáa at vita, tí hóast tað bert eru gingnir fýra mánaðir, síðan avtalan frá 12. oktober 1993 varð undirskrivað, so er tað heilt óhugsandi, at danir hava havt ætlanir um at niðurbinda tann arbeiðsleysa føroyingin - taka breyðið úr munni hansara við teim avleiðingum, at hesin sami við húski flytir til Danmarkar fyri <u>har</u> at koma undir mannsømuliga skipan!

Her má liggja ein misskiljing, og tað má vera í áhuga hjá donsku stjórnini at tryggja, at sosialu- og menniskjasligu viðurskiftini hjá einum fólki í sama kongaríki ikki fullkomiliga fara í sor, men heldur at hesi eru líka mannsømulig hjá føroyinginum í Føroyum sum hjá honum, ið vegna tvørrandi fortreytir fyri at lívbjarga sær og sínum, flytir til Danmarkar.

Óhugsandi er tað eisini, at danska stjórnin hevur áhuga í, at arbeiðsleysir føroyingr í hópatali gerast arbeiðsleysir føroyingr í Danmak.

Tí eiga samráðingar av nýggjum alt fyri eitt at verða tiknar við donsku stjórnina. Samráðingar, sum geva donum nágreiniligt innlit og fatan av álvarsomu støðu teirra arbeiðsleysu og í roynd og veru støðuni hjá eini tjóð, sum orsakað hevur mist tamarhald á egnum viðurskiftum.

Havandi nevndu viðurskifti í huga er at vóna, at bæði samgonga og andstøða kann standa saman at áleggja landsstýrinum beinanvegin at taka upp samráðingar við donsku stjórnina við tí endamáli, at danir verða við til at tryggja, at arbeiðsleysir føroyingar í Føroyum ikki hava verri sømdir enn arbeiðsleysir føroyingar í Danmark. Bíðast kann ikki longur. Til tess er støða teirra arbeiðsleysu alt ov álvarsom.

1. viðgerð 22. februar 1994. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 18. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, tann 15. februar 1994 og eftir 1. viðgerð 22. februar 1994 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen, Helena Dam á Neystabø og Birgir Danielsen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen og Tordur J. Niclasen) tekur undir við málinum og mælir

til at samtykkja fyriliggjandi uppskot til samtyktar.

2. viðgerð 22. mars 1994. Málið fall við 8-0 atkvøðum.

111 Tilráðingar frá Tingmannaráði Útnorðurs

Ár 1994, hósdagin 17. februar legði Lisbeth Petersen, løgtingsmaður, vegna Tingmannaráð Útnorðurs fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at hjáløgdu tilráðingar frá Tingmannaráð Útnorðurs í árinum 1993, nr. 1, 2, 3, 5 og 6 verða fyrireikaðar av landsstýrinum til at seta í verk.

Landsstýrið skal kunna løgtingið um gongdina í málinum.

Rekommandation nr. 1/1993

I overensstemmelse med charterens kapitel 1, art. 2 har Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd enstemmigt vedtaget følgende rekommandation.

Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd henstiller på sit årsmøde på Færøerne 21. juni 1993 til Færøernes Landsstyre, Grønlands Landsstyre og Islands Regering, at forøge den fælles oplysningsvirksomhed i de vestnordiske lande betydeligt, især hvad angår turismen. Mødet henstiller til regeringerne at lade Vestnordens Turistråd (Vestnorden Tourist Board) i samråd med landenes turistråd tage sig af en særlig 3-årig oplysningskampagne mhp. dette.

Der stiles mod i årene 1994-1996 at igangsætte yderligere initiativer i turistfremstød i Vestnorden. Der forudsættes, at der stilles også ekstraordinært beløb fra de vestnordiske lande til rådighed til opreklamering og markedsføring i de pågældende lande. Rådet anbefaler, at førstnævnte initiativer bliver gennemført i tæt samarbejde med turistrådene i Vestnorden.

Til sidst anbefaler rådet i øvrigt, at Vestnorden fondets tilskud til førnævnte initiativer undersøges under henvisning til artikel 1 i fondets overenskomst fra 1986.

Rekommandation nr. 2/1993

I overensstemmelse med charterens kapitel 1, art. 2 har Vestnordens Parlamentariske samarbejdsråd enstemmigt vedtaget følgende rekommandation.

Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd henstiller til Færøernes Landsstyre, Grønlands Landsstyre og Islands Regering, at der iværksættes et kunstnerisk samarbejde mellem de 3 lande med en årlig kunstfestival på skift i Færøerne, Grønland og Island, sådan at kunstnere fra Grønland og Island kommer med sine værker på et par dages kunstfestival i Færøerne, f.eks. i 1994, og dernæst i et af de andre lande året efter. På den måde er det muligt at styrke kontakten ikke så lidt mellem landene indenfor maierkunst, musik, litteratur og fagbevægelsen i de 3 lande kontaktes, idet en sådan kunstneraktivitet finder sted indenfor forbundenes rammer. Det vil være naturligt, at en sådan kunstfestival foregår i nært samarbejde med de nordiske institutioner i vedkommende lande, og det ville være bedst, hvis den praktiske udførelse til en vis grad fandt sted hos dem.

Rekommandation nr. 3/1993

I overensstemmelse med charterens kapitel 1, art. 2 har Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd enstemmigt vedtaget følgende rekommandation.

Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd henstiller til Færøernes Landsstyre, Grønlands Landsstyre og Islands Regering, at der nedsættes en samrådsgruppe bestående af 6 deltagere fra de 3 landes undervisningsministerier og fagbevægelser til at undersøge mulighederne for at etablere en elevudvekslingsordning mellem Island, Grønland og Færøerne. Resultater skal foreligge senest på Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråds årsmøde sommeren 1994.

Rekommandation nr. 5/1993

I overensstemmelse med charterens kapitel 1, art. 2 har Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd enstemmigt vedtaget følgende rekommandation.

Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd henstiller til Færøernes Landsstyre, Grønlands Landsstyre og Islands Regering, at nedsætte et samarbejdsudvalg med den målsætning at formindske alkoholforbruget og bekæmpe alkoholmisbruget og samordne behandlingen af misbrugere i de respektive lande.

Rekommandation nr. 6/1993

I overensstemmelse med charterens kapitel 1, art. 2 har Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd enstemmigt vedtaget følgende rekommandation.

Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd henstiller til Færøernes Landsstyre, Grønlands Landsstyre og Islands Regering, at lade foretage en undersøgelse af børns og småbørnsfamiliens vilkår i de respektive lande.

1. viðgerð 22. februar 1994. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 28. februar 1994. Uppskotið samtykt við 26-0 atkvøðum.

112 Broyting í sáttmála um norrøna mentunargrunnin

Ár 1994, hósdagin 17. februar legði Bergur Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir, at "Bekendtgørelse nr. 87 af 13. september 1990 af ændringsaftale af 15. september 1989 til aftale af 15. marts 1971 med Finland, Island, Norge og Sverige om kulturelt samarbejde" verður lýst at galda í Føroyum.

Viðmerkingar:

Ríkisumboðið hevur vegna uttanríkismálaráðið spurt, um landsstýrið hevur nakað at viðmerkja til, at kunngerð nr. 87 frá 13. september 1990 um broytingar í sáttmála um norrønt mentunarsamstarv verður lýst at galda í Føroyum.

Nevndu broytingar í sáttmálanum um mentunarsamstarvið eru settar í gildi í Danmark.

Sáttmálabroytingin ger tað ikki neyðugt at gera broytingar í føroyskari lóggávu.

1. viðgerð 22. februar 1994. Málið varð beint í mentannar- og skúlanevndina, sum 6. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. februar 1994 og eftir 1. viðgerð 22. februar 1994 beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og kannað viðløgdu kunngerðina frá 1990 og sáttmálin millum Danmark, Finland, Ísland, Noreg og Svøríki um mentannarligt samstarv frá 15. mars 1971.

Nevndin mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 12. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 19-0 atkvøðum.

113 Skipan millum Føroyar og Ísland millum um sínámillum fiskirættindi í 1994

Ár 1994, hósdagin 17. februar legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið tekur til eftirtektar úrslitið av samráðingunum í Tórshavn 6. januar 1994 millum Føroyar og Ísland um sínámillum fiskiveiði í 1994, ið var soljóðandi:

Føroysk skip kunnu veiða 6.000 tons av botnfiski, tiarav 700 tons kunnu vera toskur og 400 tons kalvi, á íslendskum øki, meðan íslendsk skip kunnu veiða tilsamans 2.000 tons av síld og 1.000 tons av makreli á føroyskum øki. Loyvt verður 16 føroyskum línuskipum í senn at veiða undir Íslandi.

Viðmerkingar:

Á fundinum í Tórshavn 6. januar 1994 luttóku fyri Føroyar: Thomas Arabo, landsstýrismaður, Kjartan Hoydal, fiskivinnustjóri og fulltrúarnir Kaj P. Mortensen, Eyðfinnur Finnsson og Ulla Svarrer Wang.

Fyri Ísland luttóku: Torsteinn Pálsson, fiskimálaráðharri og Árni Kolbeinsson, ráðharrastjóri.

Tølini fyri føroysku botnfiskaveiðuna undir Íslandi í 1993 vóru løgd fram. Ísland hevði ongan fiskiskap undir Føroyum í farna ári.

Partarnir fóru ígjøgnum samstarvið um fiskirannsóknir og teir fiskastovnar, sum eru á havleiðunum hjá báðum. Semja var um at taka stig til at fáa í lag samstarv við onnur lond, sum partarnir hava fiskastovnar saman við, serliga viðvíkjandi norðurhavs-sildini. Dentur varð lagdur á tørvin á at samskipa fiskirannsóknir á víðu havleiðunum vestan fyri fiskimarkið hjá báðum londum.

Partarnir umrøddu sjónarmiðini viðvíkjandi at gagnnýta hval og kóp, serliga seinastu gongdini í altjóða hvalaveiðunevndini, IWC, umframt arbeiðið í NAMMCO og øðrum altjóða felagsskapum.

1. viðgerð 22. februar 1994. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 4. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. februar 1994 og eftir 1. viðgerð 22. februar 1994 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og **er samd** um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 21. mars 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

FL jnr. 1510-7/92.

114 Samráðing við ríkisstjórnina um lutvísa niðurfrysting og/ella avskriving av almennu skuld Føroya og realistiska afturgjaldsskipan av restskuldini

Ár 1994, týsdagin 15. februar legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

1. **Løgtingið ásannar, at føroyski búskapurin er nú ov niðurpíndur til at rinda aftur alla ta almennu uttanlandsskuldina.**

2. **Løgtingið áleggur tí landsstýrinum at taka upp samráðingar við ríkisstjórnina um at niðurfrysta og/ella avskriva part av uttanlandsskuldini og fáa fasta realistiska afturgjaldsskipan av restini.**

3. **Um neyðugt heimilar løgtingið landsstýrinum at útvega sær professionella**

hjálp frá væl skikkaðum altjóða figgjarserfrøðingum til at samráðast um skuldaravskriving og restfigging.

Viðmerkingar

Orsakað av tí førda búskaparpolitikkinum minka evni og orka føroyska samfelagsins dag frá degi at gjalda aftur ta alsamt økjandi uttanlandsskuldina. Tað verður støðugt truplari bert at halda tí almenna sektorinum uppi uttan stór rakstrarhall. (Til tess hevur í mong ár verið neyðugt at læna miljardir).

Tíðin er farin, tá vit kundu klárað at goldið aftur miljarda uttanlandsskuld okkara.

Í staðin fyri at lækka kostnaðarstøðið, skatt og lønir, hava so at siga øll politisk tiltøk í áravís heldur økt framleiðslu- og rakstrarkostnaðin av samfelagnum.

Lækking av kostnaðarstøðinum, skatti og lønum, til tess at bøta lønsemiið og kappingarførið hjá íðnaði, handverki og tænastuvinnuni, hevði bøtt evni og orku vinnulívsins at tryggja lands- og kommunukøssum teirra innøkur, eisini til at rinda skuld aftur við.

Men í staðin hevur skattligi ágangurin frá almennari síðu á búskapin kroyst tað mesta av vinnuliga virkseminum undir heilt við hóparbeiðsloysi og frátlyting av fólki í túsundtal sum úrslit.

Nú máttu sjálvt tey mest tornomu havt funnið út av, at henda skeiva leið bert førir til undirgang.

Uml. 6 mia. kr. í almennari uttanlandsskuld er ein avleiðing av, at tað hevur tikið ráðandi politikarum, almennum ráðgevum og almennum pressiónsbólkum so langa tíð at ásanna vandaleiðina. (Summi halda enn væl til standa). Henda almenna uttanlandsskuld bert økist dag frá degi, tí enn eru ongar fyritreytir fyri búskaparligari vend broyttar frá tí, sum førdi okkum út á skeiva kós. Tí halda landskassans rakstrarhall fram, 1/5 mia. árliga, óbroytt sum higartil.

Avskriving av almennari skuld og ein realistisk afturgjaldsskipan fyri restskuldina eru eitt av fleiri lívsneyðugum stigum til tess at benda búskapargongdini aftur á beint. Danski staturin er nú høvuðskreditor okkara. Tað skuldi gjørt samráðingar um skuldaravskriving og afturgjald minni fløktar.

Tað er heilt vanligt, at skuldartyngd lond fáa skuld sína avskrivaða og restskuldina umfíggjaða. Men slík sanering verður javnan tengd saman við og treytað av bygnaðarbroytingum og bøttum kappingar- og afturgjaldsevnum hjá skuldarlandinum. So má eisini vera hjá okkum.

Føroyar hava myntcind felags við Danmark og kunnu tí ikki niðurskriva gjaldoyra sum onnur sjálvstøðug lond í eini roynd at bøta kappingarførið mótvegis útheiminum. Tí má Danmark ásanna, at Føroyar kunnu ikki fara í hundarnar av skuld til ríkið. Var talan um danskan landspart, høvdu allir íbúgvar ríkisins borið kostnaðin av hesi skuldaravskriving og ikki bert landsparturin, har búskapurin, eitt nú orsakað av rávørukreppu, sveik (smbr. Lise Lyck, búskaparfrøðing, sum vitjar Føroyar í løtuni).

Tað er bæði skomm og synd, at løgting og landsstýri skulu noyðast at geva skarvin yvir og biðja danir avskriva part av almennu føroysku skuldini. Men ríkisstjórnin eigur á jøvnum føti við ráðandi meirilutan í Føroyum høvuðsábyrgd av, at búskaparligu skeivleikarnir eru versnaðir av tí førda skatta-, lønar- og almenna útreiðslupolitikkinum. Tað ber heldur ikki til í allari framtíð at geva førda bankapolitikkinum í 80-árunum skuldina fyri, at nýggju donsku bankalóggávuna og Fíggingargrunnurin frá 1992 í fávitsku um føroyska veruleikan gera sín part til at skrúva Føroyar niður á eitt "slættanesstøði".

Lat tað tó vera endurtikið og undirstrikað, at ein avtala við ríkisstjórnina um skuldaravskriving og realistiska afturgjalding av restskuldini er bert eitt av mongum neyðugum stigum føroyska búskapinum til bjargingar.

Lækking av og tamarhald á almennu skuldini eru bæði gagnlig og neyðug. Men tað er tó framvegis nógv meir umráðandi at broyta tær fyritreytir, sum hava verið atvoldin til stóru uttanlandsskuldina. Lækka vit ikki kostnaðarstøðið, skatta- og lønarlagið, heldur uttanlandsskuldin bert fram at økjast, eisini eftir at og hóast hon verður niðurskrivað heilt niður á 0.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 22. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Óla Breckmann Iann 15. februar 1994 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1994 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen, Karl Heri Joensen og Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við málinum og setir eingi uppskot fram.

Ein minniluti (Anfinn Kallsberg og Tordur J. Niclasen) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot fólkafloksins.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið fall við 8-0 atkvøðum.

115 Tilráðing frá Tingmannaráði Útnorðurs

Ár 1994, hósdagin 17. februar legði Lisbeth Petersen, løgtingsmaður, vegna Tingmannaráð Útnorðurs fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at hjálagda tilráðing nr. 4 frá Tingmannaráði Útnorðurs verður fyrireikað av landsstýrinum til at seta í verk.

Viðmerkingar

Tingmannaráð Útnorðurs leggur dent á, at fyriliggjandi tilráðing verður avgreidd og sett í verk skjótast gjørligt. Viðurskiftini í marknaðarspurninginum broytast skjótt.

Spurningurin um tollsamgongu trokar seg fram, og Tingmannaráð Útnorðurs peikar á møguleikan fyri, at Grønland, Ísland og Føroyar ganga saman í slíkari møguligari avtalu.

Tí er neyðugt, at embætismenn úr nevndu trimum londum skjótast lata stjórnunum í hesum londum frágreiðing og tilmæli um spurningin.

Landsstýrið skal kunna løgtingið um gongdina í málinum.

Rekommandation nr. 4/1993

I overensstemmelse med charterens kap. 1. art. 2 har Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd enstemigt vedtaget følgende rekommandation.

Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd henstiller til Færøernes Landsstyre, Grønlands Landsstyre og Islands Regering, at sætte et hurtigarbejdende embedsmandsudvalg med embedsmænd fra de tre lande, der skal blandt andet:

1. Udrede og sammenligne de handelsaftaler, de tre vestnordiske lande har med EF, og hvilke påvirkninger et kommende norsk, svensk og finsk medlemsskap af EF får på samhandelen mellem de vestnordiske lande og fællesskabet.

2. Give et bud på evt. fremtidige fordele og ulemper for de enkelte vestnordiske lande, om disse som et toldområde går ind i en toldunion eller lignende tilknytning med EF. Parterne informerer hinanden løbende.

Udvalgets redegørelse tages op til informativ behandling på et kommende møde i Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd.

1. viðgerð 22. februar 1994. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 28. februar 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

116 Løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu

Ár 1994, hósdagin 17. februar legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu.	lagtingslov om garanti for lån til fiskemel og animalsk olie m.v. på lager.
§ 1. Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1994 at borga sum einfaldur borgsmaður fyri lánum til fiskamjøl, lýsi og matsild. Borgan verður givin fyri lánum, ið ikki mugu fara upp um 70% av lánsvirðinum.	**§ 1.** Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1994 at kautionere med simpel kaution for lån til fiskemel, animalsk olie og konsumsild. Kautionen ydes for lån, der ikke må overstige 70% af lånsværdien.
§ 2. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.	**§ 2.** Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Uppskotið er samsvarandi løgtingslóg nr. 88 frá 6. mai 1993, sum fór úr gildi 31. desember 1993, sí løgtingsmál nr. 102/1992. Tó er nú heimild fyri borgan fyri matsild. Henda heimild hevur verið í næstan øllum lógunum síðrenn 1993. Tá møguleiki sigst at vera fyri, at Norðhavssildin tekur seg upp aftur, metir landsstýrið, at heimild fyri borgan av goymslu av hesi sild aftur verður sett í gildi.

Haraftrímóti er heimildin til borgan fyri úrdrátti av svartkjafti og agn á goymslu tikin úr aftur lógini.

Danska fíggjarmálaráðið hevur góðtikið heimildina til borgan, hóast avtaluna frá 28. mai 1993, pkt. 4.

Í fíggjarárinum 1993 eru borganir veittar fyri 27 mió. kr. til fiskamjøl og lýsi á goymslu.

Í 1993 misti landskassin vegna borgan fyri niðursjóðingarvirkið umleið 1 mió. kr. Henda borgan stavaði frá 1989.

Víst verður annars til løgtingsmál nr. 44 frá 7. mai 1963, har fyrsta lógin um goymslulán kom í gildi.

1. viðgerð 22. februar 1994. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 22. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. februar 1994 og eftir 1. viðgerð 22. februar 1994 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen, Helena Dam á Neystabø, Birgir Danielsen og Flemming Mikkelsen) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) kann taka undir við málinum, men er av teirri áskoðan, at lógin eisini eigur at fevna um agn og makrel til matna og setir tí samsvarandi hesum fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1, 1. pkt. verður í staðin fyri orðini: "og matsild" sett: ", matsild, makrel til matna og agn".	I § 1, 1. pkt. indsættes i stedet for ordene "og konsumsild": ", konsumsild, konsum-makrel og agn".

2. viðgerð 24. mars 1994. Minnilutauppskotið fall við 9-0 atkvøðum. Samtykt at beina málið til 3. viðgerð við 26-0 atkvøðum.

3. viðgerð 12. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

FL jnr. 1400-7/91.

Lóg nr. 50 frá 3. mai 1994.

117 Broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings

Ár 1994, hósdagin 17. februar legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 38 frá 20. mai 1988 um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings verður gjørd henda broyting:

Í § 5, stk. 1, verður "6%" broytt til: "12%".

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring af lagtingslov om støtte til bygning af fiskeskibe på færøske skibsværfter til eksport.

§ 1.

I lagtingslov nr. 38 af 20. maj 1988 om støtte til bygning af fiskeskibe på færøske skibsværfter til eksport foretages følgende ændring:

I § 5, stk. 1 ændres "6%" til: "12%".

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Føroyskar skipasmiðjur hava leingi roynt at fáa sáttmálar um bygging av fiskiførum til útflutnings, men sýnist kappingin úr øðrum londum at vera hørð, lutvíst av størri beinleiðis stuðli og lutvíst av lægri kostnaðarstøði. Tí verður ynskt, at rentustuðulin verður hækkaður úr 6% av virði skipsins í 12%. Hetta samsvarar eisini við løgtingslóg nr. 83 frá 19. juni 1990 um stuðul til bygging av farmaskipum.

1. viðgerð 22. februar 1994. Málið vard beint í fíggjarnevndina, sum 18. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. februar 1994 og eftir 1. viðgerð 22. februar 1994 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir **ein samd nevnd** til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 22. mars 1994. Samtykt at beina málið til 3. viðgerð við 29-0 atkvøðum.

3. viðgerð 24. mars 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

FL jnr. 1400-8/91.

Lóg nr. 46 frá 8. apríl 1994.

118 Nýggj fólkatrygging

Ár 1994, hósdagin 17. februar legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um avlamis-, lívs- og eftirlønartrygging, frádrigin skattinum.

§ 1. Allir føroyingar í vinnu hava skyldu at vera undir avlamis-, lívs- og eftirlønartrygging.

§ 2. Avvarðandi hjá tryggjaðum koma somuleiðis undir trygging.

§ 3. Limir í yrkisfeløgum kunnu tekna samfelagstrygging, einstaklingar sína egnu trygging og í báðum førum ta trygging, ið tryggingartakarar í felag/einsæris halda hóska best til tørvin.

§ 4. Yrkisfeløg hava skyldu mótvegis limunum, at tey eru tryggjað.

§ 5. Allar tryggingar skulu umfata:
a) Útgjalding við deyð áðrenn fylta 67 ár, (60 ár), antin undir einum ella leypandi útgjalding árliga/mánaðarliga

lagtingslov om invalide-, livs- og pensionsforsikring, fradraget i skatten.

§ 1. Alle færinger i erhvervsarbejde er forpligtet til at tegne invaliditetsforsikring.

§ 2. Den forsikredes pårørende omfattes af forsikringen.

§ 3. Medlemmer i fagforeninger kann tegne gruppeforsikringer, enkeltpersoner deres egen forsikring og i begge tilfælde den forsikring, som de/den sikredes hver for sig skønner, passer bedst til behovet.

§ 4. Fagforeninger er forpligtet til at forsikre deres medlemmer.

§ 5. Alle forsikringer skal omfatte:
a) Udbetalingen ved død før det fyldte 67 år (60 år) enten een samlet udbetaling eller løbende udbetaling årligt/måned-

ella samanseting av báðum,

b) Útgjalding við avlamni. (2/3 av løoini ella meir) áðrenn fylta 67 ár (60 ár), antin undir einum ella leypandi, sum tørvurin er,

c) Útgjaldingin millum fylla 60 og 67 ár, (undir einum, leypandi ella bæði).

§ 6. Aðrar tryggingar, sum fólk í felag ella einsæris hava teknað, verða ikki ávirkaðar av hesi lóg og hava framvegis gildi.

§ 7. Fólka- og avlamispensjónsskipanin verður ikki ávirkað av hesi lóg, heldur ikki útgoldnu upphæddimar.

§ 8. Tá henda lóg er samtykt, fer løgtingslógin um "Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn" úr gildi.

§ 9. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

§ 10. Inngoldna tryggingargjaldið verður drigið frá goldna skattinum hjá tryggingartakaranum við upp til 9.000 kr. árliga.

ligt eller en kombination heraf.

b) Udbetaling ved invaliditet, (2/3 af lønnen eller mere) før det fyldte 67 år (60 år) enten een samlet udbetaling eller løbende efter behov,

c) Udbetalingen mellem det fyldte 60 og 67 år (i een udbetaling løbende eller en kombination heraf).

§ 6. Andre forsikringer, som personer i fællesskab eller individuelt har tegnet, berøres ikke af denne lov og har fortsat gyldighed.

§ 7. Folke- og pensionsordningen berøres ikke af denne lov, heller ikke udbetalte beløb.

§ 8. Når denne lov er vedtaget, træder lagtingslov om "solidarisk arbejdsmarkedspensionsfond" ud af kraft.

§ 9. Denne lov træder i kraft straks.

§ 10. Den indbetalte forsikringspræmie fradrages i den forsikredes skat med op til 9.000 kr. årlig.

Viðmerkingar

Hetta lógaruppskot er í tráð við løgtingsmál nr. 78/93: Endurreisn av búskapinum. Iækking av skattatrýsti, umlegging til bruttoskatt og lækking av kostnaðarstøðinum - framlagt av fólkaflokkinum, men er samstundis eisini sjálvstøðugt. Tøl og upplýsingar annars eru fingin til vega í samráð við Føroya Lívstrygging.

Tann lívs-, avlamis- og eftirlønarskipan, sum skotin er upp her, hevur fleiri fyrimunir fram um verandi skipanir og lógir.

Fólkapensjónin er ov lág, og við verandi vøkstri í talinum á eldri fólki í mun til lutfalsliga minkandi talið á vinnuførum fólki linkar orkan hjá samfelagnum at bera fíggjarligu byrðarnar av fólkapensjónini í framtíðini.

Í 80'árunum vóru 23.000 fólk á arbeiðsmarknaðinum, altso tá nærum 5 fólk í føntum arbeiði, sum kundu gjalda um skattin til hvønn pensjónist. Fráflytingin úr føroyum og arbeiðsloysið hava gjørt, at longu nú eru bert uml. 15.000 fólk í arbeiði. Altso nú eru bert 3 fólk at bera útreiðslurnar til hvønn pensjónist.

Tí má aldurdómurin hjá fólki tryggjast í størri mun enn higartil. Hetta lógaruppskot ger

Føroyar til eitt betri stað at eldast í.

Somuleiðis er almenna avlamispensjónin hvørki til at liva ella doyggja av, og hetta uppskot evnar at tryggja avlamnum betri inntøku.

Vanlukkutryggingin røkkur hvørki til lítið ella stórt, og tí er rætt at lógarstyggja rættin hjá fólki, ið doyggja av vanlukku ella koma sær til skaða, og avvarðandi teirra at eiga eina trygd, sum hetta lógaruppskot eisini veitir.

Arbeiðsmarknaðargrunnurin:
Henda uppskotna samtrygging hevur fleiri fyrimunir við sær: Í fyrsta lagi ávirkar hon ikki og er óávirkað av verandi pensjónsskipanum, undantikið "Arbeiðsmarknaðarskipanin", sum fellur burtur, um hetta uppskot verður samtykt. Men um Arbeiðsmarknaðargrunnin er at siga, at tær hálvthundrað miljónirnar, sum eru savnaðar í hann farnu 4 árini, høvdu ikki munað til meir enn 1 mánað av verandi pensjónsgjøldum. Landsstýrismaðurin í almannamálum helt ikki sítt lyfti í apríl 1991, at inngjaldið í grunnin skuldi fáa fyrimun av tryggingarrentu. Tað varð flutt í bankan, og nevndin er bert samankallað eina ferð. Hon veit einki um rentutilskrivingina. Nú hevur ALS lænt alt grunnsfæið fyri 5% rentu. Kanska líka frægt, tí partur av fænum hevði helst verið mistur, tá bankarnir fóru av knarvanum, tí tað kemur ikki undir innlánstrygdargrunnin ("indskydergarantifonden"). Arbeiðsmarknaðargrunnurin fer kanska í søguna, og hann ger hvørki til ella frá, hvørki nú ella seinri.

Men við eini arbeiðsmarknaðartrygging eru pengarnir hjá tryggingartakarunum vardir við strongum reglum, hvussu teir kunnu lænast út, og av Tryggingaravtalulógini.

Fyrimunir við hesum uppskoti:
Henda uppskotna samtrygging ber í sær persónligt frælsi til at laga útgjaldið til veruliga tørvin hjá hvørjum einstøkum borgara/tryggingartakara og húski hansara/hennara. Uppskotið hevur hesar fyrimunir fram um verandi Arbeiðsmarknaðargrunn.

1. Lógin er ein lívstrygging við stórari útgjalding við deyð í ótíð, t.e. áðrenn fylta 67 ár.

Tryggingin kann altin verða útgoldin undir einum og vera minst einar 2-3 árslønir, ella ið hvussu er nóg stór til at niðurgjalda øll persónlig lán. Møguligt er eisini at velja eina árliga útgjalding lívsvarandi ella í minsta lagi 10 ár, ella samanseting av báðum møguleikum.

Tryggjaði ásetir sjálv/ur hesa upphædd eina ferð um árið.

Tørvurin fyri slíkari útgjalding er stórur, tí í løtuni eru um 540 einkjur og 125 einkjumenn, ella 665 ialt, og av hesum fáa einans 40 einkjur einkjupensjón frá tí almennu einkjupensjónsskipanini. Broytingarnar í tølunum ymsu árini vísa týðiliga, at einkjurnar noyðast út á arbeiðsmarknaðin at royna at klára seg sum frægast. Nú eru møguleikarnir fyri at fáa arbeiði hjá so ábærum bólki sum einkjum nógv versnaðir.

2. Henda lógin er avlamistrygging við stórari útgjalding við avlamni.

Henda útgjalding eigur at vera 80% av ársinntøkuni og fellur til útgjaldingar frá Føroya Lívstrygging, tá tryggjaði gerst 2/3 óarbeiðsførur ella 2/3 avlamin ella meira. Men veitingin

verður útgoldin. longu tá ein gerst 2/3 óarbeiðsførur.

Hetta er nógv betri skipan enn verandi almennu forsorgarhjálpin. Til sammetingar treytar forsorgarhjálpin. at avlatmi eigur ikki tøkan pening, og forsorgarhjálpin verður eisini ávirkað av inntøku hjá hjúnafelaganum. Henda uppskotna lógin veitir somu útgjalding uttan mun til uppsparing og hjúnainntøku tryggingartakarans.

Um tørvin kann annars vísast á. at Almannastovan í løtuni rindar miðal og hægstu avlatmispensjón til fleiri enn 1.600 avlatmispensjónistar, og fáa hesi í miðal bert millum 53-76.000 kr. árliga, beinleiðis av liggjarlógini. Hetta eru smá tøl sammett við vanligar ársinntøkur, bóast ein lítil partur av almennu avlatmispensjónunum er skattafríur.

Til sammetingar tryggjar hetta lógaruppskot tann veruliga tørvin hjá fólkinum við 80% av inntøkuni. Sundurgreinað á nakrar inntøkubólkar tryggjar uppskotið avlatmisútgjøld sum niðanfyri víst:

Ársinntøka	kr. 100.000 á 80%	= kr. 80.000
-	kr. 140.000 á 80%	= kr. 112.000
-	kr. 160.000 á 80%	= kr. 128.000
-	kr. 200.000 á 80%	= kr. 150.000
-	kr. 250.000 á 80%	= kr. 200.000

Við slíkum veitingum eftir hesum tryggingaruppskoti kemur landskassin sum frá líður at spara pening til avlatmisveitingar, og fólkið kemur at fáa ta avlatmisveiting, tey í veruleikanum hava fyri neyðini. samstundis sum henda inntøkan er skattskyldug inntøka hjá móttakaranum, sum landskassan fær inntøkur av.

Íkestandi 20% hava tey flestu rætt til at fáa sum avlatmisveiting frá Almannastovuni, tó ikki fyrrenn endaligt avlatmi er staðfest. (Fyri persónar við inntøku undir 100.000 kr. er rættast at skjóta upp 20% av inntøkuni.)

3. Í báðum førum kann tryggingartakarin laga omanfyri nevndu útgjaldingar eftir persónligum tørvi hins einstaka ella yrkisfelaga (um talan er um samlagstrygging) og eisini fáa bæði at passa saman við persónligu eftirlønartryggingina hjá sær, sum eisini er umfatað av hesum uppskoti.

4. Henda lógin ber í sær, at tryggingargjaldið verður drigið frá goldna skattinum og lættir sostatt skattatrýstið á allar inntøkur við somu upphædd (9.000 kr.). Uppskotna skipanin lættir lutfalsliga mest um hjá lægru inntøkubólkunum. Harafturímóti herðir gjaldið til Arbeiðsmarknaðargrunnin skattatrýstið bæði hjá løntakara og arbeiðsgevara.

5. Henda lógin virkar frá byrjan skjótari og munabetur enn Arbeiðsmarknaðarskipanin, (sum eingin nytta hevur verið í higartil og verður tað neyvan fyrrenn nakað inn í næstu øld, og tá framvegis uttan rentutilskriving eftir tryggingarskipanini).

6. Henda lógin tryggjar eisini eina útgjalding millum 60 og 67 ár. Henda útgjalding kann antin vera alt undir einum ella leypandi árlig útgjalding ella sammeting av báðum, alt eftir persónligum tørvi.

(Rentan hjá Føroya Lívstrygging er í løtum 7% (2% hægri enn hægsta bankarenta). Síðstu 12 árini hevur grundarlagsrentan + bonusrentan hjá Føroya Lívstrygging verið um 10% í meðal, tó seinastu 2 árini um 9%. Men nú fíggjarognaravgjaldið varð lagt á ein part av fænum, er rentan fyribils broytt til 7%.).

7. Høvuðsvinningurin fyri flestar tryggingartakarar verður sambært hesum lógaruppskoti eftirlønin, pensjónin til ellisárini eftir fylta 67 ár. Men her hevur rentutilskrivingin og áramálið fyri tryggingina størst týdning. Bæði í Føroyum og í grannalondum okkara roynist langtíðarsamansparing til ellisárini nógv betur gjøgnum tryggingarfeløgini og eftirlønarkassarnar enn gjøgnum eina almenna almannaskipan.

Borgarin fær eftir hesum uppskoti hægstu rentu til ellísárini og røttu veitingar við deyða ella óarbeiðsføri áðrenn.

Borgarin fær sjálvur høvi frammanundan at áseta veitingar á hvørjum ári í mun til egnan tørv og møgulig minstukrøv ásett antin gjøgnum yrkisfelag ella lóggávuvaldið og undir leiðbeining av kønum fólki eftir persónligum ynski.

Heimaarbeiðandi húsmóðirin fær vanliga sína samansparing saman við tryggingini hjá húsbóndanum. Men tørvurin til fíggjarliga hjálp við óarbeiðsføri ella deyð er til staðar, og kann hetta loysast við ískoyti til hansara trygging.

8. Tryggingargjaldið er her sett javnt fyri allar tryggingartakarar, 9.000 kr. Men har yrkisfeløg ella einstaklingar sjálvi hava ásett annað gjald, kann tað hægra gjaldið verða brúkt. Endamálið við at fastleggja eitt gjald sum 9.000 kr., er mest fyri at fáa arbeiðandi fólkið longu í ungum árum regluliga at seta pening av til eftirlønarendamál. Men samansetingina av tryggingini eiga tey sjálvi at vera við til at taka støðu til.

9. Hetta uppskotið tálmar almennu nýtsluni og fremur eina uppsparing upp á 90 mió. kr. árliga (um vit siga, at henda skipan umfatar 10.000 skattgjaldarar, sum enn ikki hava eftirlønartrygging). Men verandi almenna skipanin við beinleiðis veiting frá skattgjaldara til pensjónist økir almennu nýtsluna og munar ov lítið fyri pensjónistin, tí eingin rentutilskriving er í longdini.

10. Uppskotna skipanin økir uppsparingina í samfelagnum við 90 mió. kr. árliga + rentuvinningin. Sostatt gagnar hon bæði einstaklingum og vinnulívinum, sum fær betri fíggingarmøguleikar til arbeiðsskapandi tiltøk.

11. Mótsett tungu, óliðiligu og munalítlu Arbeiðsmarknaðarskipanini ber hetta lógaruppskotið valfrælsi í sær fyri einstaka tryggingartakaran.

Samanumtikið virkar henda uppskotna samtrygging eisini fyri avvarðandi hjá tryggingartakarum, heimaarbeiðandi húsmóðirini, einkjuni og einkjumanninum, serliga tá óvæntað deyðsfall rakar familjufólk millum 20 og 67 ára aldur. Eini 80-90 fólk í hesum bólki doyggja hvørt einasta ár.

Uml. 7-8.000 einstaklingar í Føroyum (av um 17-18.000 í løntari vinnu) hava longu teknað trygging einsæris ella samlagstrygging gjøgnum yrkisfelag. Fleiri modell eru tøk, og

landsstýrið er væl kunnað við ymsar møguleikar frá teim samráðingum, ið verið hava um eftirlønar-, lívs- og avlamistryggingar við yrkisfeløg, ið hava lønar- og starvssáttmálar við hitt almenna, t.d. Starvsmanna-, Post-, Teknikara-, Maskinmeistara-, Løgfrøðinga-, Magistara-, Lærara-, Sjúkrasystra- o.m.o. yrkisfeløg, sum øll eru ovurfegin um sínar tryggingarskipanir. Havnar Arbeiðsmannafelag hevur fingið frálíka samlagstrygging og var millum slóðbrótandi verkamannafeløgini at fáa slíka trygging.

Men enn er eingin slík trygging fyri nøkur av størstu feløgum í landinum, eitt nú Føroya Arbeiðarafelag og Handverkarafeløgini. Tey bíðaði og bíðaði, men vórðu vónsvikin av Arbeiðsmarknaðargrunninum, sum hvørki varð egg ella ungi. Hesir túsundtals løntakarar fáa við hesum uppskoti møguleikan at tryggja sær aldurdómin, umframt lívs- og avlamistrygging, goldin um afturhaldsskipanina.

Munurin á pensjón við "gjald-so-hvørt-veiting" og við trygging:

Tá hitt almenna átekur sær ábyrgdina av allari inntøkutrygd borgaranna í trongstøðu, kennir hin einstaki seg minni eggjaðan til sjálvur at spara pening saman at tryggja seg móti skaða, avlanni og aldurdómi.

Tískil hevði henda lógin um sjálvpensjónering elvt til størri samansparing í samfelagnum. Hon hevði givið vinnulívi og ti almenna størri fíggukeidur at læna frá. Serliga væl hevði henda skipan komið við í dag, nú landsstýrið leggur hald á allan rentuvinning, lemjir harvið allan sparihug og trýstir innlán og bankajavnar niður.

Henda tryggingarskipan hevði aftur givið fólki meir sjálvsábyrgd fyri egnum lívi og aldurdómi. Samstundis hevði meingi føroyingurin sum tryggingartakari økt sín ognarlut í samfelagsvirðunum. Kapitalurin hevði verið spjaddur á nógv fleiri hendur enn nú. Ein demokratisering av eini nógv øktari peningasamansparing hevði eisini gjørst veruleiki við hesi tryggingarskipan. Vit høvdu sloppið undan verandi støðu, at gjøldini av Føroya fólki er tvingað við verandi "gjald-so-hvørt-skipan" at hóra fíggjognum lívið til ein óvissan aldurdóm, meðan bert tær stóru inntøkumar og yrkisfeløg teirra tryggast alment løntu sum er fáa fyrimunin av rentutilskriving við tryggingaravtalum og kapitalpensjón.

Ein umfatandi heildartrygging fyri alt Føroya fólk uttan fyri ávirkan av landskassa og almannaverki hevði gjørt, at politikarar høvdu havt minni høvi til at pilkað við og broytt pensjónsskipanirnar í heilum. Politisk uppílegging í tíð og ótíð hevur bert gjørt útlitini fyri aldurdómi ótryggari og pensjónsskipanina óstøðugari.

Samfelagsligi munurin á eini "gjald-so-hvørt-skipan" við beinleiðis veiting frá skattgjaldara til pensjónist uttan rentutilskriving og eini langtíðar tryggingarskipan við rentuvinningi, har hvør einstakur ella yrkisbólkur eitt heilt arbeiðslív rindar til sína egnu avlamis-, lív- og eftirlønartrygging, er ovurstórur. Sum sammetandi dømi kann verða nevnt (í dagsprísum):

Ein pensjónistur livir uml. 10 ár í meðal, frá 67-77 ára aldur, og fær uml. 50.000 kr. árliga, ella uml. 500.000 kr. falt í fólkapensjónsinntøku. Hugsa vit okkum, at viðkomandi sjálvur eftir "gjald-so-hvørt-skipan" uttan rentutilskriving, sparir hesa upphædd saman alt sítt virkna lív, frá 20-67 ára aldri, merkir tað eitt mánaðargald upp á uml. 900 kr. (47 ár x 12 mánaðir x 900 kr. = ca. 500.000 kr.).

Sami pensjónistur, um hann sjálvur spardi saman hesar 500.000 kr. **við rentutilskriving** (eftir hesum lógaruppskoti), so tørvaði honum bert at goldið uml. 250 kr. mánaðarliga í 47 ár til tess at fingið útgoldið 500.000 kr. sum eftirlønargjald. Altso økir rentuvinningurin eftir tryggingarskipanini spartorkuna av einum føstum langtíðar inngjaldi 3-4 ferðir!

Snara vit døminum eitt sindur á, so hevði eitt fast inngjald upp á 900 kr. mánaðarliga í 47 ár fíggjað tryggingartakara t.d. hesar pensjónsmøguleikar:

1. Útgjald við deyð áðrenn 67 ár:	kr. 300.000
(Við deyða straks eftir tryggingartekning, hóast 300.000 ikki eru inngoldnar + uppspard saldo, eftir at samlaða tryggingargjaldið er farið upp um 300.000 kr.)	
2. Avlam. pensjón, 80% av ársløn	kr. 120.000
(árl. frá avlamnisdegi).	
3. Eftirlønartrygging frá 67 ári	kr. 2.200.000
(2,2 mió. kr.)	

(Henda samanseting av pensjónsmøguleikum kann broytast eftir ynski tryggingartakarans)

Henda pensjónstryggingarskipan er lógarfest, men gevur hvørjum tryggingartakara sær frælsi undir ábyrgd til at avgera samansetingina av egnari pensjón. Hon órógvar ikki verandi skipanir, uttan avtekur hin nyttuleysa Arbeiðsmarknaðargrunnin. Føroya Lívstrygging hevur longu uml. 600 mió. kr. í samansparing og fær uml. 55 mió. kr. árliga í pensjónsgjøldum. (Hendan heildartrygging savnar 90 mió. kr. árliga + rentur). Ei heldur kemur uppskotið í staðin fyri verandi fólkapensjónsskipan ta fyrstu tíðina, men verður heldur eitt gott ískoyti, javnber samlagstryggingina hjá HA. "Gjald-so-hvørt-skipanin" klárar sína uppgávu eina tíð fram. Men eftir fáum árum verður henda uppskotna heildartryggingin høvuðsálitið.

Føroya Lívstrygging kann umsita eina slíka samtrygging fyri allar 17.000 løntakarar (umsitur í dag 7.000 tryggingar). Tryggingargjaldið er sett til uml. 5% av vanligari ársløn, men drigið frá goldnum skatti nervar tað ikki inntøkuna hjá fólki.

Fyrimunurin við hesi uppskotnu samtryggingini fram um ein naknan og einstáttaðan Arbeiðsmarknaðargrunn og fram um vanliga kapitalpensjón er, at útgoldna tryggingarhæddin altíð verður dagførd við lønarlagið, samstundis sum hon fremur trygga og støðuga prís- og lønargongd í samfelagnum yvir longri áramál.

1. viðgerð 22. februar 1994. Málið vurð beint í ídnaðarnevndina, sum 21. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 17. februar 1994 og eftir 1. viðgerð tann 22. februar 1994 beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirluta og ein minniluta.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Jacob Lindenskov, Karl Heri Joensen og Flemming

Mikkelsen) setir eink uppskot fram. Meirilutin vísir annars á tingmálini nr. 69/1993: Tryggingarlóggávan. nr. 70/1993: Broytingar í tryggingaravtalulóginni og nr. 149/1993: Umskipan av Føroya Lívstrygging til partafelag. sum eru til viðgerðar í ídnaðarnevndini.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot fólkafloksins.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið fall við 9-0 atkvøðum.

119 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum v.m.

Ár 1994, hósdagin 17. februar legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 175 frá 18. december 1992 verður sett sum § 2 A:

"Landsstýrinum verður heimilað at áseta reglur um frádrátt í gjaldinum fyri serliga trygdarfremjandi útgerð við gjaldsútroknaingina sambært § 3 fyri persónsvognar og sambært § 5 fyri vøruvognar um fyri akfarið er fráboðaður ein prisur sambært § 2, stk. 1, ið fevnir um nevndu útgerð. Frádrátturin verður veittur við einsháttaðum frádráttum fyri allar persónvognar ávikavist allar vøruvognar og verður ásettur fyri hvønn útgerðarlut sær. Frádrátturin fyri hvørt akfarið sær kann í mesta lagi vera kr. 0.000 fyri persónvognar og kr. 0.000 fyri vøruvognar. Fyri akfør, ið hava ABS bremsur, verður umframt veittur serligur

lagtingslov om ændring i lagtingslov om registreringsafgift af motorkøretøjer m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 175 af 18. december 1992 indsættes som § 2 A:

"Landsstyret bemyndiges til at fastsætte regler om fradrag i afgiften for særligt trafiksikkerhedsfremmende udstyr ved afgiftsberegningen efter § 3 for personbiler og efter § 5 for varebiler, såfremt der for køretøjet er anmeldt en pris efter § 2, stk. 1, som omfatter nævnte udstyr. Fradraget ydes med ensartede beløb for alle personbiler henholdsvis alle varebiler og fastsættes for hver udstyrsgenstand. Fradraget for det enkelte køretøj kan maksimalt udgøre kr. 0.000 for personvogne og kr. 0.000 for varevogne. For køretøjer, der er forsynet med ABS bremser, yder der tillige særlig fradrag på kr. 0.000 for personbiler og kr.

frádráttur upp á kr. 0.000 fyri persónvognar og kr. 0.000 fyri vøruvognar. Fyri luftpútu í bilróðri verður umframt veitur serligur frádráttur upp á kr. 0.000 fyri persónvognar og kr. 0.000 fyri vøruvognar.

Stk. 2. Í avgjaldinum, tá nýggj akfør verða avgreidd sambært § 6, er frádrátturin kr. 0.000, um akfarið hevur ABS bremsur og kr. 0.000 fyri luftpútu í bilróðri. Í avgjaldinum, tá nýggj akfør verða avgreidd sambært § 4 og § 10, er avdrátturin kr. 0.000, um akfarið hevur ABS bremsur og kr. 0.000 fyri luftpútur í bilróðri. Treyt fyri frádráttin er, at fyri akfarið er fráboðaður ein prísur sambært § 2, stk. 1, ið fevnir um nevndu útgerð."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir kunngerð.

0.000 for varebiler. For luftpude i rattet ydes tillige særlig fradrag på 0.000 for personbiler og kr. 0.000 for varebiler.

Stk. 2. I afgiften af nye køretøjer, der afgiftsberigtiges efter § 6, er fradraget kr. 0.000, såfremt køretøjet er forsynet med ABS bremser og kr. 0.000 for luftpude. For nye køretøjer, der afgiftsberigtiges efter § 4 og § 10 er fradraget kr. 0.000, såfremt køretøjet er forsynet med ABS bremser og kr. 0.000 for luftpude i rattet. Det er en betingelse for fradraget, at der for køretøjet foreligger en anmeldt pris efter § 2, stk. 1, som omfatter det nævnte udstyr."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar

Mannalívið er ov dýrabært til at verða roknað í peningi. Kortini farast fleiri í ferðsluni á hvørjum ári, sum kundu verið spard, um trygdarútgerðin í bilunum var í lagi. So harmiligt er við trygdarútgerð til bilar, at ósløkkjandi tosti hins almenna eftir peningi hevur gjørt hesa útgerð ov dýra hjá bileigarum at útvega sær hana.

Enn fleiri fólk missa førleikan í styttri ella longri tíðarskeið, og teim tørvar lækna- og aðra hjálp eftir ferðsluóhapp, sum kosta tí óhapsrakta og eisini landskassa hópin av arbeiðstíð og peningi, meðan viðgerðin varar, og tann løstaði kemur aftur fyri seg. Ofta verður førleikin ikki afturvunnin.

Hetta uppskotið miðar móti at gera trygdarútgerð, t.d. ABS-bremsur (Anti-Block System) og luftpútur (Air-bags) í bilróðrum avgjalds- og tollfría bilútgerð. Tollurin er nú 200% av fakturaprísi.

Anti-Blok skipanin er elektronisk útgerð, sum passar til allar bilbremsur. Hon forðar blokering av hjólunum og tryggjar, at bilførarin missir ikki tamarhaldið á bilinum, sum kann stýrast uttan um vandapunktið undir sjálvt harðastu bremsing.

Luftpútur fáast nú eisini til øtil bilróður. Tær rigga soleiðis, at tær, annars samanlagdar í hjartanum á bilróðrinum, blásast upp elektroniskt eitt brotsekund eftir samanstoyt og eru flerifalt so holl verja sum vanlig trygdarbelti móti snuddi í høvd, bróstkassa og búk undir sterkum bil-samanbresti.

Um tolling av hilbeltum er at siga, at tey kosta bert viðføning av samlaða bilprísinum.

Verður hetta uppskot samtykt, fellur prísurin á ABS-bremsum og luftpútum við 2/3 av verandi prísi, nú henda lívverandi trygd hert er dýr eykaútgerð, úr eini 10-15.000 kr. niður í 3.-5.000 kr. fyri hvørt.

Nevnast kann, at luftpútur eru nú frítiknar serlig avgjøld í Danmark, tí tær próvfast bjarga so nógvum mannalívum.

Landskassin hevði eingi mist av inntøkum, um henda lívbjargandi trygdarútgerð til bilar varð toll- og avgjaldsfrí, serliga tí verandi forðandi høga tolling av bilum ger, at eingir bilar verða seldir yvirhøvur.

Eydnast at yvirtala løgtingið at samtykkja hesa lóg, og um lógaruppskot nr. 73/1993 verður samtykt, so allir bilar verða millum fjórðing og triðing billigari enn í dag, kundi næsta stig verið at gjørt luftpútur og ABS-bremsur lógarkravda standardútgerð. Tað sparir bæði teim óhapsraktu, teirra avvarðandi, heilsu- og almannaverkinum nógv meiri pening, enn tað kostar eyka fyri hesa trygd í bilum.

Tær viðkomandi krónuupphæddirnar, ið settar eru til 0 í § 1, verða dagførdar til nevndarviðgerðina.

1. viðgerð 22. februar 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 26. apríl 1994 legði fram felagsálit.

Sí felagsálit í løgtingsmáli nr. 73/1993.

2. viðgerð 27. apríl 1994. Uppskotið fall við 8-0 atkvøðum.

120 Skeljaveiðan hjá "Ólavi Hvíta" á innaru leiðunum norðanfyri og heimild

Ár 1994, fríggjadagin 18. februar legði Niels Pauli Danielsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at steðga skeljaveiðuni á innaru leiðunum norðanfyri og at syrgja fyri, at tað verður lagt fyri fiskivinnunevnd løgtingsins og samtykt har, áðrenn nøkur royndarloyvi verða givin.

Viðmerkingar

Tað hevur ljóðað, at "Ólavur Hvíti" royndartrolar eftir skeljum á innaru leiðunum norðanfyri, og at "Norðheim" hevur gjørt tað sama.

Fyri nøkrum árum síðani trolaði "Fame" á leiðunum norðanfyri og fekk væl av jákupsskeljum. Útróðrarmenn kendu seg tá órógvaðar og stúrdu fyri avleiðingunum av tílíkari troling, sum teir eisini hava stúrt fyri og framvegis gera tað í øðrum fiskiveiðulondum. Tað er botnurin, ið broytist, og lívið á botni, ið verður órógvað, so at fiskurin fær ilt við at trívast.

Í fiskivinnunevndini hevur verið umsókn frá monnum, ið hava søkt um stuðul til at trola eftir jákupsskel og taka skeljarnar úr við hond. Landsstýrið samtykti at játta 100.000 kr. til hesa roynd, men umsóknin varð ikki samtykt í fiskivinnunevndini. Formaðurin var einsamallur, ið tók undir við málinum. Tí er tað ikki komið ígjøgnum.

Loyvið til at gera royndir eiga eisini at verða løgd fyri fiskivinnunevnd løgtingsins, men har er eingin umsókn viðgjørt og tí heldur ikki samtykt, so at tað er løgið, um landsstýrið hevur sent bát ella skip út at gera royndir uttan um fiskivinnunevndina. "Norðheim" hevur loyvi til at royna eftir skeljum eystan fyri Nólsoynna, men útróðrarmenn halda seg hava sæð skipið roynt eisini á innaru leiðunum norðanfyri. Roynt varð í dag at seta landsstýrismanninum í fiskivinnumálum fyrispurningin um trolingin hjá "Ólavi Hvíta" eftir skeljum norðanfyri, men tað restaði ein atkvøða í at samtykkja, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður. Formaðurin í fiskivinnunevndini var ein teirra, ið ikki vildi atkvøða fyri, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður. Tí verður málið reist sum tingmál.

1. viðgerð 3. mars 1994. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 27. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 18. februar 1994 og eftir 1. viðgerð 3. mars 1994 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Landsstýrið hevur støðgað royndarveiðina eftir skeljum við "Ólavi Hvíta" og hevur boðað frá, at skeljaveiðan ikki verður tikin uppaftur fyrrenn nærri kanningar eru gjørdar av skeljaveiðuni undir Føroyum. Nevndin setir ti einki uppskot fram.

2. viðgerð 28. apríl 1994. Málið varð aftur tikið.

121 Lóg um etiskt ráð fyri biomedisinska gransking

Ár 1994, friggjadagin 25. februar legði Niels Pauli Danielsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at "lov om oprettelse af et etisk råd og regulering af visse biomedicinske forsøg" frá 3. juni 1987 verður lýst at galda í Føroyum við teimum fyrisitingarligu broytingum, ið landsstýrið heldur vera neyðugar at gera.

Viðmerkingar

Við tí framkomnu tøkn, vit í dag ráða yvir, gerst tað neyðugt at seta greiðar reglur, ið verja menniskja og varðveita virðingina fyri tí einstaka.

Í Danmørk hevur fólkatingið tí samtykt eina lóg um etiskt ráð, ið er í samsvar við ta kristnu menniskjuáskoðanini. Endamálsgreinin í lógini er soljóðandi: "Ráðið skal í virki sínum byggja á ta fortreyt, at mannalív byrjar í gitingini".

Lógin um etiskt ráð fyri 1987 er enn ikki sett at galda í Føroyum, sjálvt um rættarnevnd løgtingsins á vári 1992 mælti til, at senda landsstýrinum uppskotið hjá Kristiliga fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki, tí at nevndin hevði ikki høvi ella umstøður til at gera tær neyðugu kanningarnar.

Trygdina hjá barninum í móðurlívinum tykist lítið verða hugsað um, sjálvt um løgtingið hevur samtykt at taka undir við SÞ-sáttmálanum frá 20. november 1989, ið sigur, "at barnið vegna likamligt og sálarligt óbúni hevur tørv á serligari vernd og umsorgan, bæði fyri føðing og eftir føðing, herundir eisini hóskandi løgfrøðiliga verju."

1. viðgerð 3. mars 1994. Málið varð beint í rættarnevndina. sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 25. februar 1994 og eftir 1. viðgerð 2. mars 1994 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt uppskotið til samtyktar um at "Lov om oprettelse af et etisk råd og regulering af visse biomedicinske forsøg". Rættarnevndin vísir á álit í løgtingsmáli nr 86/1991 har samsvarandi mál varð sent landsstýrinum til kanningar.

Rættarnevndin kann taka undir við, at løgtingið mælir ríkismyndugleikunum og landsstýrinum til at seta í gildi lóg nr. 353 frá 3. juni 1987 "om oprettelse af et etisk råd og regulering af visse biomedicinske forsøg" í Føroyum, serliga við tað at læknaliga virksemið fer fram innan karmarnar av hesi lóg.

Henda samtykt eigur tó at vera treytað av, at ígildissetan fyri Føroyar av hesi lóg ikki hevur við sær umsitingarligar útreiðslur ella, at etiskt ráð verður sett á stovn í Føroyum, av tí at hvørki gransking ella annað virksemi, ið er fevnt av hesi lóg fer fram í Føroyum.

Rættarnevndin setur tí fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið at leggja fyri løgtingið uppskot til samtyktar um ígildissetan fyri Føroyar av lóg nr. 353 frá 3. juni 1987 "om oprettelse af et etisk råd og regulering af visse biomedicinske forsøg" sambært teimum treytum, ið rættarnevndin hevur víst á.

2. viðgerð 22. apríl 1994. Uppskotið til samtyktar frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni fall við 9-0 atkvøðum, uppskotið frá rættarnevndini samtykt við 19-0 atkvøðum.

122 Løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn (131/1992)

Ár 1994, friggjadagin 18. mars legði rættarnevndin fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð 31. mars 1993 beint í rættarnevndina.

14. mai 1993 varð við 18-0 atkvøðum samtykt, at rættarnevndin skuldi verða millumtinganevnd málinum viðvíkjandi.

Rættarnevndin hevur undir viðgerðini av uppskotinum til løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn havt kunnandi fundir við Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, Hannu Joensen, forkvinnu í javnstøðunevndini, og Hans Trúgva Henriksen, løgfrøðing. Spurt varð m.a., hvussu stór umsiting krevst til tess at umsita lógina. Bæði landsstýrismaðurin og javnstøðunevndin mettu, at verandi umsiting fór at megna at avgreiða fyrisitingina. Javnstøðunevndin fer at halda fram møguliga við einum hálvum starvi.

Rættarnevndin tekur undir við endamáli lógarinnar, tað er at beina burtur allan mismun vegna kyn, og ikki bert formliga, men eisini í verki at veita kvinnum og monnum eins møguleikar til útbúgving, arbeiði og yrkisliga og mentannarliga menning. Rættarnevndin hevur í hesum sambandi eisini fest seg við, at Norðurlandaráðið leggur stóran dent á at fáa javnstøðu í umboðanina.

Í uppskoti landsstýrisins hevur rættarnevndin broytt § 3, stk. 2, ið viðvíkur starvslýsingum. Rættarnevndin skjýtur upp, at tað ikki er loyvt arbeiðsgevara í starvslýsingum at lýsa eftir bert øðrum kyninum, uttan so, at starvið er treytaleyst kynsbundið. Hetta fyrivarni var ikki í uppskoti landsstýrisins.

Somuleiðis hevur rættarnevndin broytt § 8 viðvíkjandi vali av nevndum og ráðum. Í uppskoti landsstýrisins er § 8, stk. 2, tikið burtur. Hetta pettið snúði seg um, hvussu privat felløg og sjálvsognarstovnar skulu velja umboð í almennar nevndir og ráð. Grundgevingin fyri at taka burtur hetta pettið er, at rættarnevndin er av teirri áskoðan, at man við hesi lóg skal avmarka uppfiegging í viðurskifti á privata arbeiðsmarknaðinum.

§ 8, stk. 1, snýr seg um almennar nevndir, umboð og líknandi. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið hevur rættarnevndin her skoytt uppí, at "Fyribrigdið "tað almenna" skal skiljast í fyrisitingarligum høpi".

Tað er ein samd rættarnevnd, ið mælir til at samtykkja lógina við teimum broytingum, sum rættarnevndin hevur skotið upp.

Tó hevur Birgir Danielsen hesar viðmerkingar:

1) Hetta er ikki floksmál, og tí kann hann ikki tryggja undirtøku frá fólkaflokkinum.
2) Vísandi til § 11, 6. stk. eigur at verða ansað eftir, at javnstøðunevndin ikki fær so stórt vald, at hon verður ein dýrur og stirvin stovnur og møguliga ein 3. partur í samráðingunum á arbeiðsmarknaðinum.

Samsvarandi omanfyristandndi setir **ein samd nevnd** fram soljóðandi

Broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

1) § 3, stk. 2 verður orðað soleiðis: "Ikki er loyvt arbeiðsgevara at lýsa eftir fólki til arbeiðis, har tað á nakran hátt bendir á, at annað kynið hevur fyrimun, uttan so at starvið er greitaleyst kynsbundið. Heldur ikki er loyvt útbúgvingarstovnum at søkja eftir næmingum, har annað kynið hevur fyrimun. Í heilt serligum føri kann javnstøðunevndin geva undantaksloyvi."	1) § 3, stk. 2 affattes således: "Det er ikke tilladt arbejdsgivere at annoncere efter folk til arbejde, hvor det på nogen måde viser sig, at det ene køn har fortrinsret, uden at arbejdet er betingelsesløst knyttet til det ene køn. Det er heller ikke tilladt undervisningsinstitutioner at søge efter elever, hvor det ene køn har fortrinsret. I ganske særlige tilfælde kan ligestillingsudvalget give tilladelse til undtagelse."
2) § 8, stk. 2 gongur út, og stk. 3 verður stk. 2.	2) § 8, stk. 2 udgår, og stk. 3 bliver stk. 2.

2. viðgerð 7. apríl 1994. Samtykt at beina málið til 3. viðgerð við 20-0 atkvøðum.

3. viðgerð 15. apríl 1994. Málið endaliga samtykt við 18-6-5-3 atkvøðum (navnakall).

Lóg nr. 52 frá 3. mai 1994.

FL jnr. 1355-2/91.

123 Ungdómsarbeiði við fornminnum til ferðavinnuna

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at flyta hóskandi og munagóða peningaupphædd á § 13: Samferðsla og samskifti, og § 18: Vinnuliv og arbeiðsmarknaður annars, t.d. 5 mió. kr. í verandi fíggjarári og frameftir, sum skal brúkast til at seta í stand gomlu bygdagøturnar og varðarnar í samstarvi millum Landsverkfrøðingsstovnin og ungdóms- og ítróttarfeløg kring landið.

Viðmerkingar

Tað snørist samanum atlastaðni. Játtanin til útbygging og viðlikahald av vegakervi og havnum er skarvað úr 400 niður í góðar 100 mió. kr. eftir 6 árum, samstundis sum ungmanna-, ítrivs-, áhuga- og ítróttarfeløg grenja seg um, at tey fáa langt ífrá tær sømdir á fíggjarlógini, sum tey plagdu at fáa. Játtanin til ungmannafeløgini er í 94 sett til uml. 1,5 mió. kr. (íroknað bygdahús), til ítróttin, tilsaman uml. 5,5 mió. kr. (ferðing innanoyggja og íløgur íroknað).

Somuleiðis eru játtanir til øll fornminni, søvn o.a. skerdar niður um 9 mió. kr. alt samsvaranndi lakari almennum innløgum. Nú tá mestsum bert hin almenni sektorurin er eftir av tí upprunaliga vinnufíggjaða búskapinum, hoyknar hann eyðvitað undir síni egnu (yvir)vekt.

Samstundis verður roynt at menna ferðavinnuna. Tó eru bert játtaðar um 4.5 mió. kr. beinleiðis, umframt tað, sum drýpur av stóru 25 mió. kr. játtanini til vinnufremjandi endamál á § 18 í fíggjarlógini.

Av omanfyri nevndu búskapartættum er ferðavinnan hon við frægast framtíðarútlitum. Hon gevur uttaneftir uml. 150-200 mió. kr. tilsamans í inntøkum árliga. Men vit skulu ikki gera okkum vónir um munandi vøkstur í ferðafólkatalinum, um vit ikki miðvíst fjálga um fornminni og mentannaligu sereyðkenni okkara.

Ein nógv undirmettur partur av Føroya søgu er okkara gomlu bygdagøtur, sum vóru grundarlag undir øllum samskifti heilt fram til koyrivegirnar og bilarnar. Varðarnir fram við gøtunum eru partur av hesum siðaarvi.

Fjallagøturnar og teir symbolsku varðarnir eru yvirhøvur farin í forna, og nógvastaðni er farvegurin neyvan at hóma longur, hóast tær vórðu tráddar av nógvum fótum dagliga. Tó hava vit stundum hoyrt, at t.d. skótar hava sjálvbodnir hampað gøturnar og laðað varðar uppaftur. Nøkur munu eisini av eintingum leggja steinar upp á varðarnar, tá tey ganga

framvið.

Frá meiningakanningunum millum útlendsk ferðafólk í Føroyum vita vit, at tey geva oyggjum okkara góð skoðsmál fyri náttúruupplivingar, sum tað ber til at fáa her. Summi leita hendan vegin mest fyri at ganga tjøllini, eygleiða fugla- og plantulív og sita við tráðunum við vøtn og tjarnir.

Høvdu gomlu bygdagøturnar verið væl kortmerktar, í góðum standi, lættar at finna og ganga, eisini í támutum veðri og um summardimmini, høvdu tær ivaleyst lagt til umdømi Føroya sum ferðamannaland.

Landsverkfrøðingsstovnurin hevur víst hesum mentaarvi okkara ans og lagt onkra ætlan fyri ábótum á varðar og bygdagøtur. Landsstýrið veit av hesum.

Nú prisurin á føroyskari arbeiðsmegi er pressaður so høgt upp av m.a. skattatrýstinum, loysir lítið og einki vinnuligt virksemi seg longur. Hvørki vit ella útlandið hava ráð til at gjalda fyri føroyska kostnaðarstøðið. Ungdómur okkara sleppur tí ikki at nýta sínar nógvu kreftir í vinnuni til egið gagns og har við búskaparins. Almennar játtanir til "arbeiðsskapandi tiltøk" eru smyrsloyndir at bøta tann skaða, sum alment avskeplaða kostnaðarstøðið hevur gjørt á búskapin.

Ungmannafeløgini gremja seg um, at tær rummisligu almennu játtanirnar í 80-árunum til teirra virksemi eru so nógv skerdar.

Tí verður skotið upp her, at ein partur av játtanini til Landsverkfrøðingsstovnin, og til § 13 og til § 18: Vinnulív og arbeiðsmarknaður (Tiltøk fyri ung) verður brúktur til at seta bygdagøtur kring landið í stand. Stovnurin eigur amboð og royndar arbeiðsleiðarar til at skipa fyri hesum umvælingum. Ungmannafeløgini kundu fingið tíggjarliga ágóðan av hesum nennandi kropsliga arbeiði hjá limunum.

Ferðamannavinnan hevði fingið eitt aktiv aftrat í hesum bygdagøtum til at "selt" Føroyar sum ferðamannaland. Allur búskapurin hevði fingið gagn og nyttu burturúr hesum tiltaki.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í tíggjarnevndina, sum 26. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Óla Breckmann vegna fólkaflokkin tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1994 beint í tíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen, Karl Heri Joensen og Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Ein minniluti (Anfinn Kallsberg) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja

uppskot fólkaflokksins.

Ein annar minniluti (Tordur J. Niclasen) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 22. apríl 1994. Uppskotið fall við 7-0 atkvøðum.

124 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1994, fríggjadagin 25. februar legði Signar á Brúnni, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

§ 33, nr. 12 verður orðað soleiðis:

"Meirútreiðslur til kost, húsaleigu, ferða- og flutningsútreiðslur, sjúkra- og vanlukkutryggingar, ið skattgjaldari hevur vegna inntøkugevandi arbeiði í útlondum ella umborð á útlendskum skipi, sambært hesi áseting, treytað av, at dvølurin uttanlands er vegna arbeiði, og at dvølurin uttanlands í inntøkuárinum antin er 2 mánaðir uttan slit ella í minsta lagi 100 samdøgur í inntøkuárinum. Frádráttur fyri tær í pkt. 1 nevndu meirútreiðslur verður veittur fyri skjalprógvaðar útreiðslur. Tá talan er um arbeiði á landi í útlondum, verður frádráttur vegna meirútreiðslur til kost og húsaleigu tó veittur sum ein samdøgurfrádráttur. Líkningarráð Føroya ásetur Samdøgurfrádráttin og frádráttin fyri sjúkra- og vanlukkutrygging, og kann ráðið eisini áseta neyvari reglur fyri, hvussu frádrátturin verður veittur. Frádráttirnir eftir hesum reglum kunnu tó tilsamans ongantíð verða størri enn skattskylduga uttanlandsinntøkan."

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og er galdandi frá og við inntøkuárinum 1994.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændring:

§ 33, nr. 12 affattes således:

"Merudgifter til kost, logi, rejse- og befordringsudgifter, syge- og ulykkesforsikringer, der påføres skatteyder i forbindelse med indtægtsgivende arbejde i udlandet eller ombord på udenlandsk skib efter disse regler, forudsat at den pågældende i indkomståret har haft uafbrudt ophold i udlandet i 2 måneder eller at opholdet i udlandet i løbet af indkomståret i alt har omfattet mindst 100 døgn i indkomstsåret. Fradrag for de i pkt. 1 nævnte merudgifter, gives for de dokumenterede udgifter. Er der tale om arbejde på land i udlandet, gives fradrag for merudgifter til kost og logi dog som et døgnfradrag. Døgnfradraget og fradraget for syge- og ulykkesforsikring fastsættes af Færøernes Ligningsråd, som også kan fastsætte nærmere bestemmelser om, hvorledes fradraget ydes. Fradragene i henhold til disse regler, kan dog sammenlagt aldrig være større end den skattepligtige udenlandsindkomst."

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen, og har virkning fra og med indtægtsåret 1994.

Viðmerkingar:

Hetta uppskot landsstýrisins til broytingar í skattalógini er ein útgreining og nágreining av verandi § 33, nr. 12 í skattalógini.

§ 33, nr. 12 varð sett inn í skattalógina við løgtingslóg nr. 194 frá 10. desember 1993. Við hesi reglu er fingin heimild fyri, at føroyingar undir fullari skattskyldu í Føroyum, men sum arbeiða uttanlands longri tíðarskeið, og har ein týðandi partur av grundarlagnum fyri skattaútrokningini í Føroyum er inntøka frá arbeiði uttanlands, fáa rætt til at draga ymiskar meirútreiðslur í sambond við arbeiði frá. Serliga er hugsað um ferða- og flutningsútreiðslur til og úr Føroyum og arbeiðsplass, hóast serliga reglan um ferðafrádrátt annars varð sett úr gildi pr. 1. januar 1993.

Við atliti at teim serstøku viðurskiftum, ið gera seg galdandi fyri hesar inntøkubólkar, metti landsstýrið, at heimild átti at verið fyri at drigið slíkar útreiðslur frá. Fyritreytin er, at løntakarin sjálvur hevur goldið útreiðslurnar.

Somuleiðis er heimild veitt til at draga meirútreiðslur til kost og húsaleigu frá sum ein samdøgursfrádrátt eftir serligum reglum. Líkningarráðnum er heimilað at áseta samdøgursfrádráttin.

Frádráttur fyri kost og húsaleigu verður soleiðis veittur sum ein samdøgursfrádráttur, meðan frádráttur fyri ferða- og flutningsútreiðslur verður veittur fyri skjalprógvaðar útreiðslur.

Undir viðgerðini av upprunaliga lógaruppskotinum í løgtingsins skattanevnd varð víst á, at í samband við tryggingarviðurskiftini hjá teim skattgjaldarum, sum fara uttanlands at arbeiða, hevur hesin bólkur av skattgjaldarum meirútreiðslur av arbeiðnum uttanlands, við tað, at tá føroysku sjúkrakassarnir ikki fevna um arbeiðsskaðar uttanlands, eru hesir noyddir at tekna eyka sjúkratrygging og møguliga aðra vanlukkutrygging eisini. Soleiðis varð eisini í lógini veitt heimild til at draga frá meirútreiðslur fyri sjúkra- og vanlukkutrygging vegna arbeiði uttanlands. Líkningarráðið ásetur frádráttin fyri sjúkra- og vanlukkutrygging.

Uppskot landsstýrisins er sostatt einans ein nágreining av verandi lógarreglu í § 33, nr. 12, soleiðis at tað verður staðfest, at fyri at hava rætt til frádrátt eftir nevndu reglu, er tað framvegis eisini ein fyritreyt, at talan er um lønandi arbeiði uttanlands, men tað verður ikki ein treyt, at hetta arbeiði eisini skal vera uppi á landi í útlandinum. Soleiðis verður við hesum uppskoti landsstýrisins nú herumframt eisini heimilaður frádráttarrættur fyri meirútreiðslur til vistarhald, ferða- og flutningsútreiðslur, sjúkra- og vanlukkutryggingar, ið skattgjaldari undir fullari skattskyldu í Føroyum hevur vegna inntøkugevandi arbeiði umborð á útlendskum skipi, sum ikki er skrásett í Føroyum.

Frádráttur fyri meirútreiðslur til kost, húsaleigu, ferða- og flutningsútreiðslur, sjúkra- og vanlukkutryggingar, kann verða veittur fyri skjalprógvaðar meirútreiðslur.

Tá talan er um arbeiði á landi í útlondum, kann frádráttur vegna meirútreiðslur til kost og húsaleigu, tó bert verða veittur sum ein samdøgursfrádráttur.

Líkningarráðið fær heimild til at áseta samdøgursfrádráttin og frádráttin fyri sjúkra- og vanlukkutrygging, og kann eisini áseta neyvari reglur fyri, hvussu frádrátturin verður veittur.

Frádráttirnir kunnu tilsamans tó ongantíð vera størri enn tann skattskylduga uttanlandsinntøkan.

Í samband við hesa síðstnevndu uppskotnu broytingina til § 33, nr. 12 kann verða nevnt, at sambært § 29, nr. 11 í skattalógini er ásett, at í skattskyldugu inntøkuna verður ikki talt virðið av vistarhaldi hjá sjófólki umborð. Nevnda regla er soleiðis at meta sum ein serlig undantaksregla frá meginregluni í § 25 í skattalógini um, hvat verður roknað uppí skattskyldugu inntøkuna, og sum við nevndu lógarheimild í § 29 í skattalógini hevur heimilað, at virðið av vistarhaldi hjá sjófólki umborð ikki skal roknast uppí skattskyldugu inntøkuna, ella er at roknað sum skattafrítt.

Nevnda grein ella aðrar reglur í skattalógini hava hígartil soleiðis ikki heimilað fyri frádráttarrætti vegna avhildnar kostútreiðslur umborð á skipi, fyri ferða- og flutningsútreiðslur ella fyri sjúkra- og vanlukkutrygging vegna arbeiði umborð á útlendskum skipi, sum ikki er skrásett í Føroyum, men verður við hesum soleiðis skotið upp, at heimila slíkum frádráttarrætti.

Galdandi umsitingarmannagongd á hesum øki viðvíkjandi kostútreiðslum hevur annars verið, at skattgjaldari umborð á skipi bert hevur skattað av nettoløninni, við tað at hesin eisini hevur fingið frádrátt fyri tann partin sum hann sjálvur hevur goldið vegna kost umborð, hetta út frá eini tulking mótsetningsvís av galdandi reglum, sbr. § 29, nr. 11 í skattalógini, í eini roynd at javnstilla teir, sum hava goldið fyri kost umborð við teir, sum hava fingið skattafrían kost umborð.

Við ásannan av teirri serstøðu hesir persónar eru í og havandi í huga, at føroyskir skattgjaldarar umborð á útlendskum skipum hava ávísar neyðugar meirútreiðslur vegna teirra arbeiði umborð, verður mælt til, at tað verður skapt slík serstøk frádráttarheimild eisini fyri nevndu kostútreiðslur, sum teir hava avhildið umborð á útlendskum skipi, eisini tá havt verður í huga, at hesir við verandi umsitingarmannagongd hava fingið áðurnevnda frádrátt vegna teirra avhildnu kostútreiðslur umborð.

Skotið verður upp at broytingarnar hava gildi frá og við 1994, og soleiðis fyrstu ferð eru galdandi fyri 1994.

1. viðgerð 3. mars 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 21. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. februar 1994 og eftir 1. viðgerð 3. mars 1994 beint í skattanevndina.

Í sambandi við viðgerðina hevur skattanevndin fingið skriv frá Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Føroya Fiskimannafelag og frá Henry Christiansen. Umframt hetta hevur nevndin havt fund við feløg og persónar.

Eisini hevur nevndin havt fund við Finnboga Ísakson, landsstýrismann og umboð fyri Toll- og Skattstovu Føroya.

Manningarfeløgini ynskti uppskotið víðkað til eisini at fevna um onnur mál. Nevndin heldur tað vera rætt, at landsstýrið og Toll- og Skattstovan fáa høvi til at viðgera sjónarmiðini nærri, og at nevndin fær frágreiðing um gongdina í málinum, og hevur tí biðið um ummæli av innkomnum skrivum.

Undir viðgerðini í nevndini er komið fram, at allir sjómenn, sum sigla við donskum skipum, fáa eitt "eykaskatt" í Danmark í form av skylduni at gjalda 5% í donskum arbeiðsmaknaðargjaldi/bruttoskatti.

Toll- og Skattstovan metir neyðugt at taka spurningin upp til neyvari viðgerð við danska skatamyndugleikar, fyri at fáa eina heilt greiða lýsing av, hvørjir føroyskir skattgjaldarar verða raktir av danska bruttoskattinum og fyri at fáa upplýst neyvari um ætlaðu broytingarnar í lógini. Um støðan framhaldandi verður, so sum reglurnar í dag eru, vil Toll- og Skattstovan taka málið upp við landsstýrið fyri at viðgera hvat gerast kann.

Toll- og Skattstovan mælir skattanevndina til at bíða við at viðgera teir innkomnu fyrispurningarnar um bruttoskattin, til neyvari frágreiðing fyriliggur frá danska skattavaldinum til Føroya Toll- og Skattstovu.

Nevndin er sannførd um, at fæst ikki greiða skjótt á hesum spurningum, so elvir hetta til uppaftur støri flyting av landinum, og nevndin er samd um, at teir føroyingar, sum koma inn undir hendan danska eykaskattin, eiga at fáa hesa upphædd afturrindaða, og tí mælir ein samd skattanevnd landsstýrinum til at hera skjótt at við viðgerðini.

Ein samd nevnd mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við omanfyrinevndu sjónarmiðum í huga.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Samtykt at heina málið til 3. viðgerð við 28-0 atkvøðum.

3. viðgerð 27. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

Lóg nr. 64 frá 10. mai 1994.

125 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1994, fríggjadagin 25. februar legði Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 120 a, 1. stk. verða orðini: "og upplýsingar, sum nevndar eru í § 120 b, 2. stk." strikað.
2) Í § 120 b, 1. stk. verða orðini "uttan at biðið verður um tað" strikað.
3) Í § 120 b, 2. stk. verður orðið ", persóntal" strikað.
4) § 120 c. verða strikað.
5) Í § 120 h verða orðini "uttan at biðið verður um tað" strikað.
6) Í § 120 j verða orðini "uttan at biðið verður um tað" strikað.
7) Í § 120 k verður "herundir persóntal" strikað.
8) § 120 l verður strikað.
9) § 120 m verður strikað.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1993 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 120 a, stk. 1 udgår ordene: "samt oplysninger, som nævnt i § 120 b, stk. 2."
2) I § 120 b, stk. 1 udgår ordene: "uden opfordring".
3) I § 120 b, 2. stk. udgår ordet: ", personnummer".
4) § 120 c udgår.
5) I § 120 h udgår ordene: "uden opfordring".
6) I § 120 j udgår ordene "uden opfordring".
7) I § 120 k udgår "herunder om personnummer".
8) § 120 l udgår.
9) § 120 m udgår.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Í sambandi við kontoyvirlit, hava viðskiftafólk fyri stuttum frá peningastovnum fingið áminning, har sagt verður frá, "at P-talið skal verða skrásett í peningastovnunum innan 1.3.94, annars kann ongin flyting fara fram av konti í peningastovnunum."

Uppskotsstillarin hevur áður roynt at fáa meiriluta á tingi fyri, at borgarar landsins sluppu frá, at geva peningastovnunum v.m. P-talið.

Nú verður aftur ein roynd gjørd, ásannandi, at tað er alneyðugt at seta trygd borgarans fram um tað at innføra eina skipan, sum samtíðis skattamyndugleikunum bert hevur til endamáls "at fremja eina lagaligari loysn fyri vanligum líkningararbeiði". Ein skipan, sum sambært landsstýrið hevur tann fyrimun, "at A-skattgjaldaranum nú nýtist hvørki at hugsa um fyriboðs ella endaliga skráseting av rentuútreiðslum og at tað nú verður lættari hjá skattgjaldaranum at útfylla ognaruppgerðina."

Av góðum grundum hava nógvir ivaspurningar tikið seg upp í sambandi við P-talið, og er ein av hesum, hvørt tað er juridiskt haldbært, at konti hjá teim, ið ikki innlata P-talið, verða stongdar, soleiðis sum nú tykist at gerast veruleiki.

Hetta er at ganga ognarrættinum hjá tí einstaka borgaranum ov nær og kann undir ongum umstøðum góðtakast.

Hetta kemur í praksis at merkja, at borgarar, ið ikki lata P-talið inn, koma at kenna revsingina soleiðis, at hann við eini stongdari bankakonto ikki hevur møguleika longur at liva eina náttúrliga tilveru her á kletunum.

Hvat loyvdari nýtslu av P-talinum annars viðvíkur, má ásannast, at allir flokkar á tingi á ymiskan hátt hava gjørt seg sekar í at loyva P-talsnýtsluni. Hin vegin vísir tað seg eisini, at allir flokkar á ymiskan hátt hava mótmælt júst P-talsnýtsluni. Tí er tað burturvið at brigda hvørjum øðrum, men heldur er tað umráðandi, at allir flokkar í dag standa saman um at fremja umtalaðu broytingar havandi trygd borgarans fyrst og fremst í huga.

Hvat viðurskiftunum við peningastovnarnar/skattavaldið viðvíkur er tað ikki neyðugt við P-talinum, og skal tí heldur vísast á tann møguleika at peningastovnarnir v.m. lata sínum viðskiftafólki allar kravdar upplýsingar í einum brævi, sum skattgjaldarin so kann senda inn saman við sjálvuppgávuni.

Á henda hátt verður ikki talan um nakra samankoyring av skráum, og heldur ikki on-line atgongd til tær upplýsingar, sum peningastovnarnir hava latið.

Tikið verður heldur ikki undir við sjálvvirkandi upplýsingar skipanini frá peningastovnum o.ø. til skattavaldið. Framvegis má kunna bera til, at skattavaldið eftir áheitan fær tær upplýsingar sum valdið metir seg at tørva.

At fólkið ikki ynskir ætlaðu skipan, har P-talið á henda hátt skal nýtast eru tær umk. 10.000 undirskriftirnar, sum vórðu handaðar løgtinginum á sínni fullgott prógv um.

At borgarin nú sjálvur - við egnari undirskrift "skeppur" at geva peningastovninum "loyvi" at skráseta P-talið, er ikki annað enn ein "smart uppskrift uppá frívilligt tvang."

Fæst ikki meiriluti fyri at tryggja/varðveita frælsi borgaranna og forða fyri, at hesin við egnu undirskrift soleiðis verður noyddur at lata seg múlabinda eigur ið hvussu so er freistin at lata P-talið inn útsetast til eftir valið, soleiðis, at nýtt landsstýri/løgting fær tikið støðu til málið av nýggjum.

1. viðgerð 3. mars 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, tann 25. februar 1994 og eftir 1. viðgerð 3. mars 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og setir einki uppskot fram.

2. viðgerð 22. februar 1994. Uppskotið fall við 1-0 atkvøðu.

126 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1994, friggjadagin 25. februar legði Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 194 frá 10. desembur 1993 um landsskatt og kommunuskatt verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2, stk. 5 og stk. 13, 2. punktum, verður "1. mars 1994" broytt til: "1. mars 1995".
2) Í § 2, stk. 14, 2. punktum, verður "1. mars 1994" broytt til "1. mars 1995".

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 194 af 10. december 1993 om landsskat og kommuneskat foretages følgende ændringer:

1) I § 2, stk. 5 og stk. 13, 2. punktum, ændres "1. marts 1994" til: "1. marts 1995".
2) I § 2, stk. 14, 2. punktum, ændres "1. marts 1994" til: "1. marts 1995".

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar

Fæst ikki meiriluti á tingi fyri at seta úr gildi lógina, har landsins borgarar verða tvingaðir at handa peningastovnunum o.ø. p-talið, so verður við hesum uppskoti gjørd ein roynd at útseta málið til støðutakan hjá komandi løgtingi/landsstýri.

Annars verður víst á viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 125/93: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

1. viðgerð 3. mars 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, dann 25. februar 1994 og eftir 1. viðgerð 3. mars 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og setir eitki uppskot fram.

2. viðgerð 22. apríl 1994. Uppskotið fall við 5-0 atkvøðum.

127 Ígildissetan í Føroyum av lóg nr. 266 frá 22. mai 1986 um vaktarvirksemi

Ár 1994, friggjadagin 25. februar legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at setast kann í gildi fyri Føroyar lóg nr. 266 frá 22. mai 1986 um vaktarvirksemi við hesum broytingum:

1) § 3, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Stk. 2. Kravet i § 1, stk. 1, om dansk indfødsret og bopæl her i landet bortfalder i det omfang, dette har hjemmel i international aftale, eller ved bestemmelser fastsat af justitsministeren efter forhandling med Færøernes landsstyre."
2) í § 4, stk. 1 verður eftir orðini "fastsat af justitsministeren" skoyt uppí: "efter forhandling med Færøernes landsstyre."
3) Í § 5, stk. 1 verður 1. punktum orðað soleiðis:
"En autorisation meddeles for bestemte former for vagtvirksomhed efter § 1, for et tidsrum på højst 5 år og for hele landet eller for nærmere fastlagde områder."
4) § 2 í lóg nr. 936 frá 27. desember 1992 um broyting í lógarreglum um vinnu við grundarlagi í løggilding v.m.
5) § 2 í lóg nr. 386 frá 20. mai 1992 um broyting í ávísum lógum innan øki løgmálaráðsins.

Viðmerkingar

Landsstýrið hevur við skrivi dagfest 4. mars 1993 frá ríkisumboðnum fingið fyrispurning um lóg um vaktarvirksemi við broytingum kann setast í gildi fyri Føroyar.

Málið hevur verið hjá landfútanum til ummælis, og mælir hann til, at lógin við onkrum tillagingum verður sett í gildi fyri Føroyar.

Í áliti frá 1985, ið liggur til grund fyri lógini í Danmark, verður mett, at ein ávísur tørvur er á at hava vaktarfyritøkur, og at hesar í roynd og veru virka fyribyrgjandi móti brotsverkum. Eisini verður mett, at samskifti millum løgregluna og vaktarfyritøkur hevur týdning fyri løgregluarbeiðið.

Sostatt hevur samfelagið ein áhuga í tí virksemi, ið vaktarfeløgini hava, og var hetta høvuðssjónarmiðið fyri at gera reglur á økinum. Aftrat hesum kemur, at vaktarfeløgini reka eitt virksemi, ið soleiðis, sum tað er háttað, hevur eina serstøðu í mun til aðrar partar av vinnulívinum, tí uppgávurnar minna um ella kunnu mistakast fyri løgregluuppgávur. Ein lóggáva á økinum skuldi tí tryggja, at fyritøkurnar reka teirra virksemi á ein tryggjandi og fullgóðan hátt.

Eisini verður í álitinum mett, at borgararnir hava eitt rímiligt krav um vernd móti eftiransan og kannan, og í hesum sambandi kann nevnast, at fremjing av privatum vaktarvirksemi hevur við sær ein serstakan vanda fyri ólógligheitum, og eisini tí hevur í Danmark verið mett, at tørvur hevur verið á at fáa lóggávu á økinum.

Eftir lógini skulu vaktarfyritøkur m.a. hava serliga góðkenning ella løggilding, og er hetta eisini skipanin í Svøriki og Finnlandi.

Í tilmæli sínum frá 19. oktober vísir landfútin til, at Føroya Brunatrygging hevur heitt á landfútan um at fáa lógina setta í gildi fyri Føroyar, tá tryggingin hevur ynskt at geva avslættur til tryggingartakarar, ið eru knýttir at privatum vaktarfyritøkum. Landfútin hevur síðani veitt sær til løgmálaráðið við spurninginum, og er spurningurin nú lagdur fyri heimastýrið til støðutakan.

Mælt verður løgtinginum til, at lógin við broytingum verður sett í gildi fyri Føroyar.

1. viðgerð 3. mars 1994. Málið varð beint í nevndina. Barturdottið vegna samgonguslit.

128 Veðhald fyri láni til Arbeiðsloysistryggingina og Arbeiðsávísingina

Ár 1994, friggjadagin 25. februar legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til Arbeiðsloysistryggingina og Arbeiðsávísingina.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri lánum til Arbeiðsloysistryggingina og Arbeiðsávísingina uppá tilsamans í mesta lagi 50 mió. kr.

§ 2. Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om garanti for lån til arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån til arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen på højst ialt 50 mio. kr.

§ 2. Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Fíggjarkreppan í skipanini vísir við seinastu framrokningum, sum eru gjørdar saman við Hagdeildini, at talan er um ein likviditetstørv, sum seinast í 1994 kemur upp á uml. 40 mió. kr., og sum síðani vendist.

Landsstýrið hevur kannað møguleikan fyri, at skipanin fær í Føroya Banka, Sjóvinnubankan og Føroya Sparikassa ein rætt til at trekkja uppá eitt lán, sum í mesta lagi er 15 mió. kr. í hvørjum peningastovni, t.v.s. upp til 45 mió. kr.

Peningastovnarnir eru sinnaðir at játta hesum, tó við m.a. teirri treyt, at landskassaveðhald verður givið.

Harumframt vilja peningastovnarnir eisini seta sum treyt, at afturgjaldið av stovnsfæunum hjá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum verður flutt eitt ár. Gjaldið 1. apríl 1995 verður í staðin 1. apríl 1996. Gjaldið 1. apríl 1996 verður í staðin 1. apríl 1997.

Av somu orsøk kann Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin ikki fara at gjalda út fyrr enn 1. apríl 1997 í staðin fyri 1. januar 1997.

Í samband við, at peningastovnarnir vilja seta sum treyt fyri láninum, at landskassin veðheldur, og at hetta sambært avtaluni millum donsku stjórnina og landsstýrið frá 12. oktober 1993 ikki kann gerast, uttan at stjórnin hevur givið loyvi, hevur landsstýrið søkt um

hetta.

1. viðgerð 28. februar 1994. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 4. mars legði fram soljóðandi

Felagsálit

løgtingsmál nr. 128/1993: Veðhald fyri láni til Arbeiðslovsistryggingina og Arbeiðsávísingina og
løgtingsmál nr. 129/1993: Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. februar 1994 og eftir 1. viðgerð 28. februar 1994 beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt fund við stýrið fyri Arbeiðsloysistryggingina og landsstýrismannin Jóannes Eidesgaard og deildarstjóran í Tinganesi Johnny Winther Holbech.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Kari Heri Joensen og Hergeir Nielsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men ásannar, at lántøka ikki kann verða nøkur varandi loysn hjá ALS.

Annars vísir meirilutin til framrokningarnar hjá landsstýrinum. Hesar sýna, at talan er um ein gjaldføristørv, sum seinast í 1994 kemur upp á uml. 40 mió. kr., og sum síðani vendist soleiðis, at skipanin kemur at hava avlop.

Meirilutin ásannar, at um ALS eisini framyvir skal kunna veita teim arbeiðsleysu eina rúmliga trygd, verður neyðugt at endurskoða lógir og reglugerðir fyri skipanina. Hetta eiga stýrið fyri ALS og landsstýrið at umhugsa. Skipanin hevur møguleika fyri í ávísan mun at veita lønariskoyti til arbeiðsleys, sum taka sær arbeiði í styttri tíð. Meirilutin er vitandi um, at hesin møguleiki verður nýttur, men er talan bert um heilt fá dømi.

Meirilutin heldur, at stýrið fyri ALS og landsstýrið eiga at umhugsa lógarbroyting soleiðis, at hesin møguleiki kann verða nýttur í størri mun við tí endamáli at fáa fleiri arbeiðsleys aftur í arbeiði og harvið eisini spara skipanina fyri pening.

Um hetta verður gjørt, kundi t.d. eitt ella tvey tilkavirki verið upplatin við tí fyri eyga burturav at framleiða burtur úr innfluttum fiski.

Í § 12, stk. 11 stendur:
"Sjálvstøðugt vinnurekandi verða at rokna sum arbeiðsleys, tá persónliga arbeiði teirra í virkinum er hildið uppat. Nærri reglur um, nær sjálvstøðugt vinnurekandi verða at rokna sum arbeiðsleys, verða ásettar av stýrinum."

Meirilutin heldur, at hesar reglur eiga at verða gjørdar so skjótt sum gjørligt, og tí setir meirilutin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at heita á stýrið fyri ALS um at áseta tær reglur, stýrið sambært § 12, stk. 11 í løgtingslóg nr. 17 frá 10. mars 1992 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing hevur heimild at áseta, soleiðis at tey sjálvstøugt vinnurekandi, ið higartil ikki hava verið í skipanini, koma undir hana sum skjótast.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Karl Heri Joensen og Hergeir Nielsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Flemming Mikkelsen) hevur hesar viðmerkingar:

Áhaldandi stóra arbeiðsloysið er ein vanlagna fyri tjóðina alla.

Hóast lyfti um, at tað fór at ganga framá, hóast lyfti um arbeiði til allar hendur, hevur talið av arbeiðsleysum ongantíð verið størri enn tað sama.

Tá lógin um arbeiðsloysisskipanina var til viðgerðar í løgtinginum, vísti umboð sambandsfloksins í arbeiðaramálanevndini á, at sambandsflokkurin longu í 1975 metti politisku- og fíggjarligu gongdina í samfelagnum soleiðis háttaða, at neyðugt var við kanningunum og reglum um, hvussu ein arbeiðsloysisstuðul í Føroyum skuldi leggjast til rættis, og setti fram uppskot hesum viðvíkjandi.

Málið endaði í landsstýrinum og er har enn.

Tá varð eisini ført fram, at tað hevði verið skeivt at bíða, inntil arbeiðsloysi í fullan mun var tilstaðar.

Undir viðgerðini av verandi skipan helt sambandsflokkurin tað vera rætt at seta eina arbeiðsloysisskipan á stovn, um enn nóg so seinir á sjóvarfallinum.

Flokkurin kundi ikki taka undir við uppskotinum, sum fyrilá, hildið varð, at uppskotið ikki var fíggjarliga borðbært og kom at tyngja arbeiðsmarknaðin meiri enn gott var.

Í hesum sambandi varð uppskot til samtyktar sett fram um at áleggja landsstýrinum at taka uppskotið aftur og leggja tað fram aftur í hóvuttum líki. Uppskotið fall.

Sum kunnugt kom arbeiðsloysisskipanin, ið varð sett á stovn í 1992, rættiliga skjótt í fíggjarligar trupulleikar.

Ásannast má, at tað, sambandsflokkurin fórdi fram, í alt ov stóran mun gjørdist veruleiki.

Síðani hava royndir verið gjørdar at bjarga skipanini. Hesar hava ikki munað.

Nú hevur landsstýrið spælt út við obligatoriska bjargingarkransinum.

Metingar vísa, at hesin bjargingarháttur við lántøku, við landskassaveðhaldi, er bert at útseta pínuna.

Hartil hevur stýrið fyri skipanini mælt frá at taka undir við tilboði landsstýrisins.

Minnilutin tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins, men ásannandi hættisligu støðu landsins verður sett fram

II Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við ríkisstjórnina um eina upp á longri sikt haldbæra loysn, har allir okkara landsumfatandi trupulleikar verða tiknir við.

Mælt verður til, at arbeiðsmarknaðarrettirlønargrunnurin verður verandi í skipanini til eitt samráðingarúrslit fyriliggur.

Ein annar minniluti (Birgir Danielsen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins og hevur hesar viðmerkingar:

Arbeiðsloysisskipanin er ein privat tryggingarskipan við lógarfestum inngjaldi frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

Allir partar eru samdir um, at inngjaldið undir verandi umstøðum ikki kann hækka.

Skipanin er uppbygd soleiðis, at hon ikki kann bera eitt varandi arbeiðsloysi upp á meir enn triðing av tí, vit í dag hava - kanska minni.

Tað kann eingin ivi vera um, at tað almenna í einum hvørjum landi hevur ábyrgd av teimum arbeiðsleysu, og so er eisini her hjá okkum, at ein privat solidarisk trygging tekur við í eini tíð er sera náttúrligt. Tryggingin kann ikki lastast fyri og bera ábyrgdina av, at arbeiðsloysið gerst størri enn roknað hevur verið við.

At hanga eina lánbyrðu um hálsin á tryggingini er óðamannaverk, so leingi vit ikki kunnu hóma ein bata í støðuni, og tað eru í løtuni eingi tekin um hetta - tíverri.

Hagdeildin hevur undir ávísum treytum, sum eru ringar at gjøgnumskoða, gjørt eina likviditetsætlan fyri 1994, 1995 og 1996, sum vísir ein likviditetsørv upp á um 40 mió. kr. við árslok 1994.

Síðan vendir gongdin soleiðis, at tað verður ein yvirskotslikviditetur upp á 92 mió. við árslok

1996, sjálvt aftan á ein avdrátt upp á lán upp á 60 mió.

Orsøkin til hetta stóra yvirskotið er, at útreiðslurnar falla frá 215 mió. til 23,5 mió. í sama tíðarskeiði, hóast talið av skrásettum arbeiðsleysum bert minkar frá 3.950 til 3.352 í tíðarskeiðnum. Útgjaldið minkar sostatt í meðal frá 54.000 til 7.000 pr. skrásettan persón.

Tað er eingin ætlan um, hvussu nógv kontoin fyri forsorg á fíggjarlógini verður økt í sama tíðarskeiði.

Undir omanfyri nevndu treytum er helst talan um 100 mió. kr.

Tá roknast kann við, at treytirnar ikki halda, verður talið størri.

Ætlaða farloyvisskipanin, sum landsstýrið hevur boðað frá, er ikki tikin við í omanfyri nevndu tølum. Einki boð er upp á, hvat hetta kann koma at kosta. Heldur ikki er tikin við ætlaða útjavningarskipan fyri flakafólk.

Niðurstøðan er: Landsstýrið hevur ikki funnið eina loysn uppá, hvat gerast skal við tey arbeiðsleysu, tá tey av natúrligum orsøkum fara úr arbeiðsloysisskipanini. Í august 1993 gjørdi stýrið í ALS landsstýrið vart við hetta, men varð skúgvað til viks. Sum gongdin er í løtuni, koma at tørva á fíggjarlógini 50 mió. til at taka við eftir ALS helst meira.

Tað kann tí ikki vera rætt av landsstýrinum at skúgva henda trupulleikan framman fyri sær við at tvinga ALS til eina lántøku. Hetta kemur bert at gera støðuna hjá ALS uppaftur verri um stutta tíð.

Likviditetsætlanin er so ótrygg, at tað kundi væl hent seg, at lántøkan er so tepur, at ALS fær trupulleikar av nýggjum, væl áðrenn hetta árið er runnið.

Tað er nógv, sum bendir á, at samstarvsstevið millum ALS og landsstýrið ikki er tað besta.

Her verður vist til, at ALS igjøgnum loftmiðlarnar verður kunnað um ætlanir landsstýrisins um eina farloyvisskipan og eina útjavningarskipan fyri flakafólk. Tað boðar heldur ikki frá góðum, at landsstýrismaðurin boðar frá, at "makkar ALS-stýrið ikki rætt", verður tað koyrt frá! Tað eigur eisini at verða átalað, at landsstýrið leggur seg út í, hvussu ALS-stýrið tekur sínar avgerðir. Í ALS hevur stýrið avgerandi orðið og eingin annar.

Í longdini er tað bert størri virksemi, sum kann loysa teir trupulleikar, vit eru í nú. Vísandi til løgtingsins samtykt frá 13. mai 1993 í løgtingsmáli nr. 199/92: Arbeiðsskapandi tiltøk, eins og álitið viðvíkjandi fíggjarlógini fyri 1992, har hugskotið "hugskotsbanki" verður umrøtt, verður sett fram soljóðandi

III Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við arbeiðsmarknaðin við tí endamáli at fáa gjørt nakað við teir spurningar, sum omanfyrinevnda løgtingssamtykt vísir til eins og hugskotshankan, umrøddur í fíggjarnevndarálitinum viðvíkjandi fíggjarlógini fyri 1992.

Fyri at loysa likviditetstrupulleikarnar hjá ALS í hesum árinum og framyvir verður sett fram soljóðandi

IV Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka neyðug stig til at fáa samanhang ímillum ALS og fíggjarlógina (forsorgarskipanin) soleiðis, at teimum arbeiðsleysu verður unt mannsømilig kor, meðan bíðað verður eftir størri virksemi.

Ásannandi, at støðan er akutt og hevur skund, at ALS er ein privat solidarisk trygging, hvørs skylda yvirfyri tryggingartakaranum er tíðaravmarkað og ásannandi, at lántøka hjá ALS er komin so langt, at óneyðug seinkan í loysn av tí akutta trupulleikanum er óheppið, verður sett fram soljóðandi

V Uppskot

til

samtyktar

Landsstýrið tekur upp samráðingar við ALS um at taka umrødda lán upp á 50 mió. kr. - ella meir um neyðugt. Treytin skal vera, at ALS fær fult endurgjald fyri lánið innan eina rímiliga tíð og soleiðis, at hetta ikki nervar virksemið hjá ALS.

Hin triði minnilutin (Tordur Niclasen) hevur hesar viðmerkingar:

Longu fyrst í desember mánaði 1993 boðaði stýrið fyri arbeiðsloysisskipanina landsstýrinum frá, at fíggjarligir møguleikar fóru ikki at verða fyri framhaldandi at útgjalda arbeiðsloysisstuðul frá 1. februar at rokna. Samstundis sendi stýrið landsstýrinum tilmæli um ikki at broyta inngjaldsprosentið og ummæli um broyting í útgjaldsprosentinum.

Tá landsstýrið ikki lat við seg kuma, sendi stýrið fyri arbeiðsloysisskipanina nýtt skriv dagf. 6. januar 1994, har mælt varð til:
- at gjaldið frá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum átti at halda fram eftir 1. apríl 1994,

- at arbeiðsloysisskipanin fekk tilskot úr landskassanum upp á 17 mió. kr. svarandi til tá ónýttu upphædd, ið avsett varð á fíggjarløgtingslógini fyri 1993 til arbeiðsskapandi tiltøk.

Viðvíkjandi gjaldinum frá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum sigur eitt samt stýri í skrivi til landsstýrið 17. januar 1994:

"Stýrið ásannar, at hesin peningur sjálvandi átti at komið upprunaliga ætlaða endamálinum til goðar, men stýrið heldur eisini, at tá landsstýrið fyri minni enn einum ári síðani ásannaði, at arbeiðsloysisskipanini tørvaði hesa pening fyri at kunna virka víðari, so heldur stýrið tað vera rímiligt, um landsstýrið framvegis hevði hesa støðu. Serstakliga tá hugsað verður um, at tørvurin á hesum peningi er enn størri enn nú, enn hann var tá."

Hetta var eisini júst tað, sum minnilutin (Tordur J. Niclasen) ásannaði og tí legði uppskot á ting 25. januar 1994 um broytingar í lógini um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn (løgtingsmál nr. 97/1993). Uppskotið, sum verður síltað í nevnd, hevur sum kunnugt til endamáls, at gjaldið til arbeiðsmarknaðareftirlønargunnin fram til 31. mars 1995 verður latið arbeiðsloysisskipanini.

Hetta hevði givið skipanini einar 22 mió. kr.

Minnilutin hevur, sum so mangur annar, mangan víst á, at arbeiðsloysistryggingin er ikki loysnin upp á arbeiðsloysið.

Tí er tað eisini væl skiljandi, at stýrið havandi arbeiðsloysisstøðuna í huga, í uppskoti til landsstýrið, gjørdi vart við uppnædd svarandi til tær ónýttu 17 mió. kr.

Arbeiðsloysisskipanin hevur eisini víst á, at tað at Føroya Landsstýri ikki hevur nýtt játtaða pening til arbeiðsskapandi tiltøk, hevur elvt til størri útreiðslur fyri skipanina, og at landsstýrið tí, sum vera man, átti at endurrinda Arbeiðsloysisskipanini ta meirútreiðslu, sum skipanin hevur havt av hesum.

Støðan hjá Arbeiðsloysisskipanini er í roynd og veru eitt álvarsligt symptom (sjúkueyðkenni) upp á eitt uppaftur meiri álvarslig samfelagsfyribrigdi (sjúku). Læknarnir (samgongan/landsstýrið) duga illa nokk at stilla diagnosuna og enn minni at geva rætta heilivágin!

Av hesi somu orsøk eru fleiri túsund fólk farin út í arbeiðsloysi við teim syrgiligu avleiðingunum, hetta hevur fyri dagligu tilveru teirra og familjur teirra.

Fleiri hundrað sóu sær onga aðra gongda leið enn at rýma av landinum.

Andstøðan hevur roynt at komið við uppskotum um loysnir/áhøtur. Longu í oktober 1991 hevði minnilutin uppskot um arbeiðsskapandi tiltøk. Aftur í mars 1992.

Arbeiðaramálanevndin arbeiddi við hesum báðum uppskotunum - og øðrum andstøðuupp-

skotum í hálv annað ár. Fundir vóru hildnir við vinnu- og verkaføløg, og uppskotini vóru - eftir øllum at døma mong.

12. mai 1993 legði nevndin so álit fram, har hon mælti til, at málið um arbeiðsskapandi tiltøk varð sent landsstýrinum, og setti fram uppskot hesum viðvíkjandi. Uppskotið, sum varð samtykt, var soljóðandi:

"Løgtingið áleggur landsstýrinum at fara undir at fremja arbeiðsskapandi tiltøk beinanvegin, og har tað er neyðugt, at leggja fram uppskot á ting tíðliga í ólavsøkutingsetuni 1993, so verulig úrslit spyrjast burturúr so skjótt sum gjørligt."

Hin hevði roknað við, at landsstýrið í hesum arbeiði hevði javnan samband við avvarðandi vinnu- og verkafeløg, men sambært upplýsingum frá teim somu, hevur landsstýrið als ikki tikið spurningin uppaftur við feløgini.

Hetta er harmiligt, tí hevur nakrantíð verið umráðandi og neyðugt hjá einum landsstýri at samvirka við vinnu- og verkafeløg, so er tað júst í dag. Fitt gott samstarv á hesum øki hevði uttan iva givið betri úrslit enn higartil eru staðfest. Her stendur so nógv upp á spæl, at ósemjur annars millum landsstýrið og avvarðandi feløg ikki mega forða landsstýrinum at taka stig til eitt konstruktivt samstarv.

Tí verður skotið upp soljóðandi

VI Uppskot

til

samtyktar

Við atliti til at seta í verk arbeiðsskapandi tiltøk verður álagt landsstýrinum at fyri eitt at taka stig til samstarv við vinnu- og verkafeløg.

Á fundi við stýrið fyri arbeiðsloysisskipanina 2. mars 1994 varð upplýst, at stýrið hevði mælt frá, at lán varð tikið, og at útrokningarnar hjá landsstýrinum als ikki komu at halda - og als ikki nú, har talan verður um farloyvisskipanin, ið kemur at tyngja munandi um skipanina. T.v.s. at fortreytirnar fyri útrokningunum hevur landsstýrið broytt frá degi til dags.

Lánini fara við hesum at gerast um 100 mió. kr., og er stórur spurningur, um skipanin nakrantíð klárar at gjalda tey aftur.

Minnilutin hevur áður vist á vandan fyri, at arbeiðsloysisskipanin gjørdist ein "koddi" - tað sama hava verkafeløg vist á. Tíanverri tykist hetta so at vera.

Støða teirra arbeiðsleysu er so álvarslig, at tað dugir ikki við órealistiskum "lappaloysnum". Tí heldur minnilutin fast við

- at gjaldið frá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum fer eitt ár afturat til arbeiðsloysis-skipanina

og

- at tær 17 mió. kr., sum ikki vórðu nýttar í 1993 at minka um arbeiðsloysi verða um neyðugt við lóg veittar arbeiðsloysisskipanini.

Samstundis eigur landsstýrið við atliti til støðu teirra arbeiðsleysu beinanvegin at taka upp samráðingar við donsku stjórnina, soleiðis sum minnilutin (Tordur J. Niclasen) hevur skotið upp í løgtingsmáli nr. 110/93, sum liggur í fíggjarnevndini til viðgerðar.

Samsvarandi hesum verður tí skotið upp

VII Uppskot

til

samtyktar

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn við seinni broytingum verður gjørd hesa broyting:

Sum nýtt stk. 6 í § 2 verður sett:

"Stk. 6. Í tíðarskeiðinum 1. apríl 1994 til 31. mars 1995 verður innigjaldið til grunnin samhært stk. 1 og 2 latið arbeiðsloysistrygdargingini."

§ 2.

Hesa lóg fær gildi frá 1. apríl 1994.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om arbejdsmarkedspension.

§ 1.

I lagtingslov nr. 39 af 7. maj 1991 om arbejdsmarkedspension med senere ændringer foretages følgende ændring: som nyt stk. 6 i § 2 indsættes:

"Stk. 6. I tidsrummet 1. april 1994 til 31. marts 1995 overgår indbetalingen til fonden i henhold til stk. 1 og 2 til arbejdsløshedsforsikringen."

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. april 1994.

VIII Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at fáa sær neyðuga heimild at játta arbeiðsloysisskipanini tilskot úr landskassanum upp á 17 mió. kr. svarandi til ónýttu upphædd, ið avsett varð á fíggjarløgtingslóg fyri 1993 til arbeiðsskapandi tiltøk.

Annars harmast minnilutin (Tordur J. Niclasen) um, at stýrið fyri arbeiðsloysisskipanina er tikið av ræði í hesum máli, sum landsstýrið annars staðiliga hevur vist á, at tað er arbeiðsmarknaðurin og stýrið fyri ALS, sum hevur ábyrgdina av teimum arbeiðsleyu.

Hetta arbeiðslag, sum nú hevur tikið seg upp ímillum landsstýrið og stýrið fyri ALS kemur

ikki at gagna teimum arbeiðsleysu, og er tað ti umráðandi, at landsstýrið alt fyri eitt tekur annað skinn um bak.

Tað er átaluvert, at landsstýrið nú uttan somikið sum at kunna stýrið boðar frá, at tað fer at leggja uppskot fyri tingið um at broyta úrokningartíðarskeiðið til 4 vikur hjá fólki, arbeiðandi á fiskavirkjum.

Umframt at vera ein grov provokatión er hetta beint í stríð við tað, sum stýrið er komið ásamt um, nevniliga at halda fast um galdandi skipan, havandi í huga at ein av høvuðsgrundunum fyri at seta hesa skipan í verk var at gera viðurskiftini hjá fólki á fiskavirkjunum soleiðis, at tey støðaðust í arbeiðnum.

Partarnir eiga tí nú at seta seg saman soleiðis at finnast kann útav, hvør ið veruliga skal hava hesa skipan um hendi - arbeiðsmarknaðurin, umboðaður av einum stýri, ella landsstýrið einsamalt.

2. viðgerð 4. mars 1994. Uppskot landsstýrisins samtykt við 17-0 atkvøðum.

3. viðgerð 4. mars 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

FL jnr. 1335-13/94.

Lóg nr. 23. frá 4. mars 1994.

129 Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn

Ár 1994, friggjadagin 25. februar legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2, stk. 6 verður "1. apríl 1995" broytt til: "1. apríl 1996" og "1. apríl 1996" broytt til: "1. apríl 1997".
2) Aftaná § 2, stk. 7 verður sum nýtt stk. 8 sett:
"**Stk. 8.** Gjøldini til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin í tíðarskeiðinum 31. mars til 30. juni 1994 verða latin arbeiðsloysisskipanini sum lán við eini rentu uppá 5% p.a.. Lánið verður at gjalda aftur í seinasta lagi 1. apríl 1997."
3) § 11, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"§ 3, § 4 og § 5, stk. 1 og 2 fáa gildi 1. apríl 1997."

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om arbejdsmarkedspension.

§ 1.

I lagtingslov nr. 39 af 7. maj 1991 om arbejdsmarkedspension med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 2. stk. 6 ændres "1. april 1995" til: "1. april 1996" og "1. april 1996" til: "1. april 1997".
2) Efter § 2, stk. 7 indsættes som nyt stk. 8:
"**Stk. 8.** Indbetalingerne til arbejdsmarkedspensionsfonden i tidsrummet 31. marts til 30. juni 1994 ydes arbejdsløshedsordningen som lån til en rente på 5% p.a. Lånet skal tilbagebetales senest 1. april 1997."
3) § 11, stk. 4 affattes således:
"§ 3, § 4 og § 5, stk. 1 og 2 træder i kraft 1. april 1997."

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin lænti í 1993 arbeiðsloysisskipanini stovnsfæið. Í hesum sambandi varð gjørd ein avtala, hvussu hetta skuldi afturgjaldast.

Helvtin skuldi gjaldast 1. apríl 1995 og hin helvtin 1. apríl 1996. Rentan varð seu til 5% p.a.

Sum ein treyt fyri, at peningastovnarnir vilja læna Arbeiðsloysisskipanini upp til 45 mió. kr., vilja teir m.a. krevja, at hetta afturgjald verður broytt soleiðis, at helvtin verður goldin 1. apríl 1996 og hin helvtin 1. apríl 1997. Rentan verður óbroytt.

Landskassin veðheldur fyri hesum láni. Broytingina av afturgjaldinum er danska stjórnin kunnað um.

Inngjaldið til arbeiðsmarknaðarettirlønargrunnin verður í tíðarskeiðinum 31. mars 1994 til 30. juni 1994 latið arbeiðsloysistryggingini sum eitt lán. Tá við 5% p.a. í rentu skal vera afturgoldið í seinasta lagi 1. apríl 1997.

Orsakað av hesum broytingum kann grunnurin ikki fara undir at gjalda út fyrr enn 1. apríl 1997 í staðin fyri 1. januar 1997.

1. viðgerð 28. februar 1994. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 4. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Sí felagsálit í løgtingsmáli nr. 128/1993

2. viðgerð 4. mars 1994. Uppskotini til samtyktar í samtykt við 29 (0 atkvøðum, II fall við 7-0, III fall við 11-0, IV fall við 12-0, V fall við 7-0, VI fall við 11-0 og VIII fall við 2-0 atkvøðum. Lógaruppskotið frá minnilutanum T. J. Niclasen fall við 0-0 atkvøðum.

3. viðgerð 4. mars 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

FL jnr. 1310-1/90.

Lóg nr. 21 frá 4. mars 1994.

130 Yvirtøka av lánunum í Húsalánsgrunninum soleiðis, at grunnurin kann viðgera støku sethúsalánini við støði í gjaldsmøguleikum hins einstaka

Ár 1994, mánadagin 28. februar legði Bjarni Djurholm, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Føroya Løgting áleggur landsstýrinum í stundini at taka upp samráðingar við ríkismyndugleikarnar við atliti at veita Húsalánsgrunninum neyðugan kapital at selja/sanera sethúsalán.

Viðmerkingar

Farnu mánaðirnar eru umstøðurnar at lívbjarga sær her á landi versnaðar munandi.

Serliga aftaná ógvusligu hækkingina av kommunuskattaprosentunum, er støðan vorðin ótolandi hjá løninóttakarunum. Serliga ring er støðan hjá teimum, sum tarnu 10 árini hava sett føtur undir egið borð.

Við avtaluni millum donsku stýrmina og landsstýrið, fingu bankarnir tilførdan kapital, svarandi til niðurskrivingina av sethúsavirðinum.

Hóast tað koin flestu sera dátt við, tá tíggjarelitirlitið í einum strikaði virðið á sethúsaognunum við eini helvt, kveikti tað sjálvsagt ta vón millum ánararnar, at nú vildu lánistovnarnir sanera partar av aftastu prioritetunum, men so varð ikki. Í staðin skulu borgarar landsins nú, umframt at gjalda ta rokning, sum landsstýrið skrivaði út at "bjarga" bankaskipanini, eisini gjalda tey lán, sum bankarnir **hava avskrivað og fingið afturgoldið** frá skattgjaldarunum.

Tískil er útspælið nýggjársaftan frá lánistovnunum ein táta. Her er alt ikki talan um hjálp til sethúsaeigararnar, tí hvat hjálpa nakrar hundrað krónur um mánaðin í útreiðslulækkan, tá tørvur er á túsundum.

Tá vit harumframt vita, at lítið meira enn 20% av útlánum bankanna eru **til** sethúsamassan, so er tað eyðsýnt, at bankarnir við eini lækkan av allari innlánsrentuni við einum prosenti, veruliga hava pláss fyri eini rentulækkan av sethúsalánunum, ið er útvið **fimm prosent**. Tí er frábodaða rentulækkingin láturlig.

Annað, sum vit eiga at leggja okkum í geyma er, at allar milliardirnar, sum bankarnir hava fingið tillutaðar frá borgarunum, eru **lætnar** bankunum **rentufrían**. Hetta merkir, at bankarnir njóta fullan **rentuvinning** av hvørjari krónu teir plasera **uttanlands**, herundir eisini av milliardaupphæddini, teir fingu lutaða vegna inissin í trygdini í føroysku sethúsunum!

Onnur andsøgn í "bankatilboðnum" er viðgerðin av hvørjum lánara einsæris. Hetta tekur alt ov drúgva tíð, umframt at óneyðuga nógvir setbúsaeigarar sum frá líður verða drignir í fútarættin við tí úrsliti, at flestu fara at kenna støðuna púrasta vónleysa.

Úrslitið verður, at minkandi gjaldsevnini saman við niðurgeringini av einstaklingunum, fer at hava við sær vantandi gjaldsvilja. Og tá tað verður regulin heldur enn undantakið, er katastrofan fullkomin.

Støðan í dag ger, at ein álvarslig líkasæla breiðir seg millum manna. Hesin veruleiki sýnist tí hvørki at nerva bankaleiðslur ella politiska myndugleikan. Men tað er kanska heldur ikki so løgið, tá tað sýnist eyðsýnt, at hesar leiðslur fyrst av øllum skulu tryggja útlendskt peningavald - kreditorar okkara. Og uppskriftina til hesa loysn kenna vit øll - føroyingurin skal gjalda mest møguliga skuld í stytst møguliga tíð. Úrslitið av hesi atgerð er, at fjøld av fólki nú rýmir av landinum.

Tað er eisini hugstoytt hjá vanliga lønmóttakaranum at kenna, at bjargingarlínan, hann veitti bankunum, nú loksins verður smoygd um hálsin á honum og.....

Niðurskrivingin av setbúsavirðinum og avgerðin um einvegis at veita bankunum missin í trygcini, hevur sett Húsalánsgrunnin í eina sera óhepna støðu, tí reelt er lítil og ongin trygd aftanfyri útlán grunsins, og er hann tí í veruleikanum insolventur. Hetta setur grunnin í eina sera veika støðu mótvegis hinum lánistovnunum, tá ræður um at finna loysnir fyri hin einstaka setbúsaskuldaran.

Um miðan okt. '93, var eitt notat frá ríkisgóðkendum grannskoðara almannakunngjørt, har víst varð á, hvussu kapitalflytingin til bankarnar kundi kanaliserast í Húsalánsgrunnin. Harvið var møguleiki fyri at foreinkla lánitrupulleikarnar á setbúsamarknaðinum, sum samstundis hevði við sær møguleikar skjótt at finna júst tað røttu gjaldsloysnina fyri hin einstaka setbúsaeigaran.

Henda loysnin var ikki fylgd, og ístaðin sluppu bankarnir við landsstýrisins vælsignilsi at flyta tilførda rentufría peningin av aftur landinum at gera útlendskar kreditorar skaðafrían og at seta restina í obligatiónir. Sostatt var Húsalánsgrunnurin sleptur á fjall, og rekist hann nú sum tongul í brimi í avtalunum gjørdar eru millum lánistovnarnar.

Henda støða er ótolandi, og er tað tí stórur vandi fyri, at grunnurin sum frá líður kemur í eina púrasta ókontrollerða støðu, har hann í einum endar í landskassanum.

Hóast milliardir eru fluttar til samfelagið seinastu 18. mðr., er onki av hesi øgiligu upphædd endað í umfari í samfelagnum, tvørturímóti. Økingin í skatta- og avgjaldstrýstinum, saman við vantandi forstáilsi frá peningastovnunum, hevur havt við sær, at borgarar landsins nú als ikki síggja fyri endan á kreppustøðuni. Støðan er so út av lagi, at húsarhald í høvuðsstaðnum (tvey vaksin og tvey børn), sum hevur eitt samlað lán áljóðandi kr. 800.000, tig sum ger øll lánini um tíl 30 ára annuitetslán, og sum bert hevur tær fyrstu útreiðslurnar annars, sum lánistovnarnir loyva, skal, um bert ein inntøka er í húsinum, forvinna **kr. 29.000 pr. mðr.!!** Og er lánsupphæddin kr. 1.000.000, skulu **kr. 32.500 í húsið um mðr.**

V.ø.o. er neyðugt at hava eina inntøku pr. ár, sum til støddar er **útvið helvtini av samlaðu**

skuldini, skal húsarhaldið svara hvørjum sítt.

Hetta er púra høpisleyst, tí bert tey allarfægstu koma í námind av hesi upphædd, hava tey bert eina inntøku at liva av. Støðan er heldur frægari, enn tað tvey, sum hava inntøku í húsarhaldinum. Við láni áljóðandi kr. 800.000 er tørvurin kr. 22.150 pr. mðr., meðan lánibyrðan áljóðandi 1.000.000 krevur kr. 24.500 pr. mðr.

Tað skal tó bert verða skoytt uppí, at **gjald fyri barnaansing ikki er við í útrokningini**. Verða t.d. tvey børn ansað á stovni krevst, at inntøkan verður hækkað við uml. kr. 5.000 pr. mðr.. Verða hesar útreiðslur taldar við, skulu **kr. 27.150 pr. mðr.** at forsvara kr. 800.000, meðan **kr. 29.500 pr. mðr.**, skulu til milliónina í skuld. Støðan er sostatt nakað betri, eru tvær vanligar inntøkur í húsarhaldinum. Hetta er tó treytað av, at onki verður goldið fyri at ansa børnunum!

Hjáløgd eru nøkur dømi. Í útrokningunum er niðurgoldin bilur tikin við. Hann kann verða roknaður frá, men ger hetta kortini lítlan og ongan mun fyri heildarúrslitið. Tað eru ongar útreiðslur settar til viðlíkahald av sethúsunum!

Tað kundi annars verið ein ávegisloysn, at loyvt hjúnum at verið skattað við helvtarbýti av eini inntøku. Loyvið kundi verið treytað av tilsvarandi minkandi møguleikum at fingið arbeiðsloysisstuðul frá ALS.

Tá tað hinvegin gerst alt greiðari, at tað framyvir ikki verður arbeiði til allar hendur, er tað eyðsýnt, at nógvu húsarhaldini verða noydd at liva av einari mánaðarligari inntøku. Tí verða lánistovnarnir í flestu førum noyddir at niðurfrysta stórar partar av lániupphæddini hjá tí einstaka, skal nakar samanhangur vera í mánaðarligu rakstrarútreiðslunum hjá húsarhaldinum.

Sostatt verður neyvt eftirlit við nýtsluni hjá tí einstaka og fíggjarliga rásarúmið tilsvarandi avmarkað. Umframt 30-ára annuitetslán, har bert rentur verða goldnar fyrstu nógvu árini, fara niðurfrystu lánini at hótta í viðførinum, tí skuldi lántakarin fingið hatnandi fíggjarligt grundarlag, verða frystu lánini tinaði so hvørt. Sostatt fara hesir lántakarar at liva á einum eksistensminimum í óavmarkaða tíð til óbótaligan skaða fyri peningaumfarið í landinum og harvið allan framburð.

Skal tí ikki øll framtíðarvón verða tikin frá borgarum landsins, við tí úrsliti, at tey sleppa endanum og rýma av landinum, er neyðugt í stundini at gera okkurt munagott til tess at lætta um byrðarnar hjá sethúsaeigarunum.

Tað er eyðsýnt, at hetta er ein sjálvsøgd uppgáva hjá forkelaðu banknunum, men tá hesir so snildisliga, orsakað av politiskum kleyvarskapi, hava sloppið sær undan hesi ábyrgd, er onki annað hjá løgtinginum at gera, enn sum frægast at hjálpa, har tingið framvegis hevur møguleika. Tí eiga tiltøk at verða framd í stundini, sum geva Húsalánsgrunninum somu sømdir at virka undir, sum bankarnir treytaleyst hava fingið.

Skal hesin grunnur framettir virka undir skipaðum viðurskiftum, er neyðugt, at Føroya Løgting ásannar, at við vetandi gongd verður Húsalánsgrunnurin ikki førur at svara sínum skyldum mótvegis kreditorum sínum. Tí eigur landsstýrið at fáa heimild at yvirtaka lán grunsins, so hvørt tey falla til gjaldingar.

Verður hetta ikki gjørt, enda vit í enn eini panikkloysn, har tilvildin aftur ræður.

Verður Húsalánsgrunnurin harafturímóti loystur frá hesum hóttafalli, gevur tað honum møguleikar at viðgera sethúsalánini á heilt øðrum støði, nevniliga í gjaldsmøguleikunum hjá einstaka lántakaranum.

Í samsvari við veruleikan, setir undirritaði tí uppskot fram til samtyktar.

1. viðgerð 7. apríl 1994. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 20. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Bjarna Djurholm, løgtingsmanni, tann 28. februar 1994 og eftir 1. viðgerð 7. apríl 1994 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen og Karl Heri Joensen) tekur ikki undir við málinum og setir eingi uppskot fram. Meirilutin vísir á uppskot landsstýrisins í løgtingsmáli nr. 83/93: Broyting í løgtingslóg um húsalánsgrunn og á álit fíggjarnevndarinnar í sama máli.

Ein minniluti (Anfinn Kallsberg) førir fram:
Uppskotið gongur út uppá at taka upp samráðingar við ríkismyndugleikarnar við atliti at veita Húsalánsgrunninum neyðugan kapital at selja/sanera sethúsalán. Tann føroyski bankin hevur seinasta 1½ árið fingið tilført út við 3 mia. kr. fyrt at uppfylla lógarkrøvini um solvens. Hetta orsakað av, at virðini aftanfyri givin lán eru fallin ógvuliga nógv. Vit hava fingið eina stóra avskriving av lánum til vinnufyritøkurnar soleiðis, at hesar í dag eru tillagaðar til ta broytta fíggjarorkuna í samfelagnum.

Aðrir bólkar, eitt nú sethúsini, verða hin vegin ikki viðgjørd á sama hátt. Ilar royna fíggingarstovnar at uppihalda tey stóru lánini, sum einki hava við søluvirði at gera, og í staðin gera teir avtalu við fólk um niðurfrystin, longda afturgjaldstíð o.s.fr. Hetta ger, at tann føroyski sethúsaeigarin nú skal nýta sína orku og førleika í 30 ár, áðrenn hann kann gera sær vón um at sita í sínum egnu húsum. Tí er neyðugt hjá føroyskum myndugleikum beinanvegin at gera eina ætlan um, hvussu vit fáa alt samfelagið tillagað til nýggja fíggjarliga støðið.

Her skal vísast til álit okkara í løgtingsmáli um fíggjarlóg fyri 1994, og má loysn fáast á:

1. Lánviðurskiftini millum landskassa og ríkiskassa
2. " hjá kommunum
3. Kostnaðarstøðið, herundir
   a. Skatta- og avgjaldsstøðið
   b. Lønarstøðið.
4. Fíggjarlógarviðurskiftini
5. Vinnulívsbroytingar
6. Sethúsaviðurskiftini.

Út frá tí, ið nevnt er frammanfyri, verður neyðugt at gera eina heildarloysn, og setir minnilutin tí fram soljóðandi

I Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið setir nevnd við umboðum úr øllum flokkum á tingi at hjálpa landsstýrinum við arbeiði tess at umskipa samfelagsbúskapin.

Minnilutin tekur undir við uppskotinum hjá Bjarna Djurholm og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

Ein annar minniluti (Flemming Mikkelsen) tekur støðu í tingsalinum.

Hin triði minnilutin (Tordur J. Niclasen) ásannar, at førdi politikkurin hjá m.a. tilkarlokkinum hevur ført okkum sum tjóð út í óføri, og hesar avleiðingar hava rakt m.o. sethúsaeigarar meint.

Minnilutin tekur undir við uppskotinum, sum hóast alt er ein roynd at bøta um støðu sethúsaeigaranna.

Ein avleiðing av, at fleiri hús er farin á tvang, og at fólk eru rýmd av landinum, kann lættliga gerast, at hesi hús og ognir verða ett spekulatiónsobjekt hjá útlendingum, ikki búsitandi í Føroyum.

Her má bindast um neilan fingur, soleiðis at tað ikki skal kunna bera til hjá útlendingum at keypa hús inn undir seg í Føroyum.

Tí verður sett fram soljóðandi

II Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka neyðug stig til at forða fyri, at føroysk hús og ognir fara á útlendskar hendur.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið fall við 7-0 atkvøðum. Uppskotini til samtyktar I og II fullu hæði við 7-0 atkvøðum.

131 Broyting í løgtingslóg um rentustudning til samansparing til húsabygging

Ár 1994, fríggjadagin 4. mars legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um rentustudning til samansparing til húsabygging.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 85 frá 24. oktober 1978 um rentustudning til samansparing til húsabygging við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 5, stk. 5 verður orðað soleiðis:
"Samansparingin skal eftir umbøn frá kontoeigara gevast leys heilt ella lutvist."

2) Í § 9 verður sett sum nýtt stk. 2:
"**Stk. 2.** Eftir at henda lógarbroyting er komin í gildi, kann nýggj samansparingskonto samhært ásetingunum í hesi lóg ikki stovnsetast."

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. apríl 1994.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om rentetilskud til opsparing til boligbyggeri.

§ 1.

I lagtingslov nr. 85 af 24. oktober 1978 om rentetilskud til opsparing til boligbyggeri med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 5, stk. 5 affattes således:
"Opsparingen skal efter kontohaverens anmodning frigøres helt eller delvis."

2) I § 9 indsættes som nyt stk. 2:
"**Stk. 2.** Efter denne lovændrings ikrafttræden kan ny opsparingskonto i henhold til bestemmelserne i denne lov ikke stiftes."

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. april 1994.

Viðmerkingar:

Í 1978 varð sett í gildi lóg um rentustudning til samansparing til sethúsabygging.

Endamálið við lógini var at eggja fólki til at spara upp til bygging av sethúsum. Í hesum sambandi vórðu 1½% av innskotinum veitt í rentustuðli úr landskassanum. Innskotið kundi í mesta lagi vera 10.000 kr. í einum álmanakkaári. Samlaði innskotspeningurin á einari sparikonto skuldi ongantíð vera hægri enn 50.000 kr. Tá farið var at byggja, var samansparingin latin leys við rentustudningi. Samansparingin kundi vera upp til 12 ár, og varð leysgivin um so var, at ikki varð farið undir at byggja.

Í førum har talan er um trotabúgv, skifti av felags búgvi í samband við hjúnaskilnað og við deyða skal kontoin gevast leys. Í slíkum førum verður rentustudningurin at gjalda aftur til landskassan.

Í 1982 og 1986 er lógin broytt soleiðis, at uppsparingin nú kann nýtast til keyp av húsum/íbúð eða grundstykki. Rentustudningurin er nú 3% og samansparingartíðin er sett úr 12 árum niður í 8 ár. Í mesta lagi 30.000 kr. kunnu setast inn á kontoina í einum álmanakkaári og samlaða innskotið kann í mesta lagi vera 300.000 kr.

Hamæst varð lógin broytt soleiðis, at landsstýrið í serligum førum eftir umsókn frá kontoeigara kann geva samansparing leysa. Sambært praksis hevur landsstýrið givið kontoina leysa, um so er, at umsøkjarin hevur søkt um at fáa kontoina leysgivna í samband við íbúgving.

Í november mánaði í fjør vóru tilsamans 1.777 konti. Samlaða uppsparingin var tá 41.770.852 kr.

Landsstýrið fær nógvar fyrispurningar og umsóknir um leysgeving av samansparingarkonti frá fólkum, sum eru í fíggjarligari trongstøðu. Sum er, kann landsstýrið ikki gera frávik í teimum førum, har talan er um fíggjarliga trongstøðu. Tess vegna skjýtur landsstýrið upp at broyta § 5, stk. 5 soleiðis, at samansparingin eftir umbøn frá kontoeigara kann gevast leys. Sambært § 5, stk. 6 skal landskassin hava rentustudningin av leysgivnu peningaupphæddini goldnan aftur. Skotið verður upp, at tá henda lógarbroyting er komin í gildi, kann nýggj samansparingskonto sambært ásetingum í hesi lóg ikki stovnsetast.

1. viðgerð 21. mars 1994. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 15. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 4. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 21. mars 1994 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og undir viðgerðini havt fund við landsstýrismannin í íbúðarmálum, Jóannes Eidesgaard.

Fíggjarnevndin kann taka undir við, at § 5, stk. 5 verður orðað so, sum skotið upp í § 1 í fyriliggjandi uppskoti landsstýrisins.

Landsstýrið skjýtur upp sum pkt. 2 í § 1 í uppskotinum, at í § 9 verður sett sum nýtt stk. 2: "Stk. 2. Eftir at hendan lógarbroyting er komin í gildi, kann nýggj samansparingskonto sambært ásetingunum í hesi lóg ikki stovnsetast. Fíggjarnevndin heldur, at skipanin við samansparingskonti er ein góð skipan, og kann tí ikki taka undir við hesum parti av uppskoti landsstýrisins.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Karl Heri Joensen, Hergeir Nielsen, Flemming Mikkelsen, Tordur J. Niclasen) setir fram soljóðandi

Broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 gongur nr. 2 út.	I § 1 udgår nr. 2.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins, sum í høvuðsheitum gongur út uppá, at avtaka skipanina.

Minnilutin heldur tað vera neyðugt at broyta treytirnar fyri útgjalding av samansparing, tá uppspararin er komin í fíggjarliga trongstøðu, men at fara so vítt, sum landsstýrið skjýtur upp, soleiðis at "samansparingin skal eftir umbøn frá kontoeigara, gevast leys heilt ella lutvíst" er at fara ov langt.

Minnilutin setir ti í staðin fyri nr. 1 í landsstýrisins uppskoti fram soljóðandi:

Broytingaruppskot

§ 5, stk. 5, verður orðað soleiðis: "Samansparingin kann eftir umbøn frá kontoeigara gevast leys heilt ella lutvist, tá hann kann ávísa, at hann er komin í fíggjarliga trongstøðu".	§ 5, stk. 5 affattes således: "Opsparingen skal efter kontohaverens anmodning frigøres helt eller delvis, når han kan påvise, at han er kommet i økonomiske vanskeligheder."

Minnilutin tekur ikki undir við nr. 2 í uppskoti landsstýrisins, tí hetta tekur møguleikan frá ungdómi okkara at fáa ískoytisrentu til uppsparing til at seta seg í búgv ella útbúgving. Tað verður helst meiri neyðugt í framtíðini at verða sjálvfíggjandi, nú fíggjarligu møguleikarnir í Føroyum eru so truplir.

2. viðgerð 21. apríl 1994. Broytingaruppskot meirilutans samtykt við 23-0 atkvøðum. Uppskot minnilutans fall við 4-0 atkvøðum.

3. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

FL jnr. 2310-1/90.

Lóg nr. 67 frá 10. mai 1994.

132 Broyting í "Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde"

Ár 1994, friggjadagin 4. mars legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í "Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde".

§ 1.

Í "Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde" sbr. "Anordning nr. 389 af 15. november 1966", sum broyttur við "Anordning nr. 281 af 22. juni 1979", verður gjørd hesa broyting:

Aftaná § 10 verður sett:

"**§ 10 A.** Fyri mál, sum eru fevnd av hesi fyriskipan krevur ráðið gjøld frá Føroya Vanlukkutrygging.

Stk. 2. Landsstýrið ásetur í kunngerð nærri reglur um tey í stk. 1 nevndu gjøld, sum ikki mugu vera hægri enn veruligu útreiðslurnar av málsviðgerðini."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde

.

§ 1.

I anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde, jf. anordning nr. 389 af 15. november 1966, som ændret ved anordning nr. 281 af 22. juni 1979, foretages følgende ændring:

Efter § 10 indsættes:

"**§ 10 A.** I sager, som er omfattet af denne anordning, opkræver rådet afgift fra Føroya Vanlukkutrygging.

Stk. 2. Landsstyret fastsætter nærmere regler om den i stk. 1 nævnte afgift, der ikke må overstige de faktiske udgifter ved sagsbehandlingen."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Sambært galdandi lóggávu, er Vanlukkutryggingarráðið játtandi myndugleiki, tá talan er um mál um avlamispensjón.

Í málum um framskundaða fólkapensjón, gevur Vanlukkutryggingarráðið landsstýrinum tilmæli.

Vanlukkutryggingarráðið viðger annars mál, sum eru fevnd av "Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde".

Landsstýrið arbeiðir í løtuni við at broyta avlamispensjónslógina og fólkapensjónslógina

soleiðis, at tað frameftir skal vera Almannastovan, sum skal vera játtandi myndugleiki, tá talan er um ávikavist avlamispensjón og framskundaða fólkapensjón. Tá neyðugar lógarbroytingar eru gjørdar hesum viðvíkjandi, fer Vanlukkutryggingarráðið einans at viðgera vanlukkutryggingarmál.

Sum er verður raksturin hjá Vanlukkutryggingarráðnum fíggjaður við einari serligari játtan á løgtingsins fíggjarlóg. Í fjør vórðu játtaðar 500.000 kr. Við omanfyri nevndu lógarbroytingum fyri eygað er játtanin í ár sett til 100.000 kr. Til tess at fíggja raksturin hjá ráðnum framyvir, skjýtur landsstýrið upp at Føroya Vanlukkutrygging skal gjalda fyri mál, sum verða viðgjørd eftir "Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde" og at landsstýrið ásetur í kunngerð nærri reglur um framman fyri nevndu gjøld, sum ikki mugu vera hægri enn veruligu útreiðslurnar av málsviðgerðini.

1. viðgerð 21. mars 1994. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina. Burturdottið vegna samgonguslit.

FI. jnr. 1020-4/92

133 Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing

Ár 1994, friggjadagin 4. mars legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 17 frá 10. mars 1992, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 108 frá 21. mai 1993, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Limir í arbeiðsloysistryggingini eru

lagtingslov om ændring i lagtingslov om arbejdsløshedsforsikring og arbejdsanvisning.

§ 1.

I lagtingslov nr. 17 af 10. marts 1992, som senest ændret ved lagtingslov nr. 108 af 21. maj 1993, foretages følgende ændringer:

1) § 1, stk. 1 affattes således:
"Medlemmer af arbejdsløshedsfor-

løntakarar, fiskimenn og túróðrarmenn, sum hava bústað í Føroyum, og sum eru undir fullari skattskyldu í Føroyum, hava fylt 16 ár, men ikki fylt 67 ár, sum ikki fáa framskundaða fólkapensjón, avlamispensjón, ella varandi hjálp og sum eru tøkir á arbeiðsmarknaðinum, ella fáa endurgjald fyri mista lønarinntøku."

2) § 1, stk. 3, litra b verður strikað.

3) Í § 2, stk. 2 verður "1. apríl 1996" broytt til: "1. apríl 1997".

4) § 3, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Tryggingartakari rindar 2.75% í tryggingargjaldi av útgoldnari A-inntøku."

5) § 3, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"**Stk. 3.** Gjaldið, sum nevnt er í hesi grein, kann krevjast ion við panting."

6) § 4, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Allir arbeiðsgevarar í Føroyum rinda 2.75% av hvørji A-lønarútgjalding til Arbeiðsloysistryggingina. Veitarar av endurgjaldi fyri mista lønarinntøku rinda 2.75% av nesum veitingum til Arbeiðsloysistryggingina."

7) § 8, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Tryggingartakari, sum er fevndur av § 1, stk. 1 og sum er tøkur á arbeiðsmarknaðinum, fær rætt til tryggingarútgjald, tá hann er vorðin limur í arbeiðsloysistryggingini."

8) § 8, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"**Stk. 4.** Tá tryggingartakari fer úr arbeiði í skúla ella læru, missir hann ikki vunna limatíð. Sama regla er galdandi, tá tryggingartakari, fer í vinnu uttanlands. Frammanfyri nevnda áseting er bert galdandi um so er, at arbeiðsloysistryggingin hevur fingið boð um hetta, áðrenn tryggingartakarin fer í skúla, í læru ella í vinnu uttanlands."

9) § 11, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"**Stk. 3.** Hjá persónum, sum bæði eru sjálvstøðugt vinnurekandi og lønsikringen er lønmodtagere, fiskere og hjemmefiskere, som bor på Færøerne, og er under fuld skattepligt på Færøerne, er fyldt 16 år, men ikke 67 år, som ikke oppebærer førtidig folkepension, invalidepension, eller varig hjælp og er disponible på arbejdsmarkedet eller som får kompensation for tabt lønindtægt."

2) § 1, stk. 3, litra b udgår.

3) I § 2, stk. 2 ændres "1. april 1996" til: "1. april 1997".

4) § 3, stk. 1 affattes således:
"Forsikringstager indbetaler 2,75% i forsikringsindbetaling af udbetalt A-indkomst."

5) § 3, stk. 3 affattes således:
"**Stk. 3.** Indbetalingen, der er nævnt i denne paragraf, kan indkræves ved udpantning."

6) § 4, stk. 1 affattes således:
"Alle arbejdsgivere på Færøerne betaler 2,75% af hver A-løn udbetaling til arbejdsløshedsforsikringen. Ydere af erstatning for mistet lønindtægt betaler 2.75% af disse ydelser til arbejdsløshedsforsikringen."

7) § 8, stk. 1 affattes således:
"Forsikringstager, der er omfattet af § 1, stk. 1 og er disponibel for arbejdsmarkedet, får ret til forsikringsudbetaling, når han er blevet medlem af arbejdsløshedsforsikringen."

8) § 8, stk. 4 affattes således:
"**Stk. 4.** Når forsikringstager holder op med at arbejde og begynder skole eller lære, taber han ikke forvunden medlemstid. Det samme er gældende, når forsikringstager kommer i arbejde udenlands. Forannævnte bestemmelser er kun gældende såfremt arbejdsløshedsforsikringen har fået besked om dette, inden forsikringstageren begynder skolegang, lære eller arbejde udenlands."

9) § 11, stk. 3 affattes således:

takarar, ásetir landsstýrið eftir ummæli frá stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina útgjaldingaruppheddina um dagin grundað á í mesta lagi 70% av A-inntøkuni teir seinastu 12 mánaðirnar, býtt við 252 døgum, samanlagt við í mesta lagi 70% av meðalskattskyldugu inntøkuni tey seinastu 3 árini, býtt við 252 døgum. Útgjaldingaruppheddin sambært hesi áseting má saman við møguligari aðrari lønarinntøku/skattskyldugum avlopi av vinnuvirki tó ongantíð fara upp um ta útgjaldingaruppheedd, landsstýrið hevur ásett."

10) § 11, stk. 4 verður strikað.

11) § 12, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"**Stk. 3.** Fyri tryggingartakarar á fiskavirkjum verður tryggingarútgjaldið roknað 4. hvørja viku frá og við 33. arbeiðsloysistíma. Fyri tryggingartakarar, sum hava avtalað ikki at arbeiða fulla tíð, verður tryggingarútgjaldið roknað við einum lutfalsligum lægri tímatali. Stýrið fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina ásetur nærri reglur um, hvørji fiskavirki koma undir ásetingarnar."

12) § 12 a, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"**Stk. 2.** Stýrið fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina ásetur nærri reglur um longdina á tíðarskeiðum, slag av arbeiði ella útbúgvingarskeiðum og treytir annars. Stýrið kann loyva avgreiðsluskrivstovuni at taka avgerð um slíkan stuðul."

13) Aftaná § 12 a. verður sett:
"**§ 12 b.** Fyri arbeiði, sum arbeiðsloysisskipanin ávísir uttanlands, kann stýrið fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina áseta nærri reglur um, at skipanin rindar fíggjarligan stuðul til ferðakostnað.
Stk. 2. Á sama hátt sum í stk. 1 kann stýrið fyri arbeiðsloysistrygg-

"**Stk. 3.** For personer, der både er selvstændigt erhvervsdrivende og lønmodtagere, fastsætter landsstyret efter udtalelse fra bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen udbetalingsbeløbet pr. dag, baseret på højst 70% af A-indtægten de sidste 12 måneder, delt med 252 dage, sammenlagt med højst 70% af den gennemsnitlige skattepligtige indkomst de sidste 3 år, delt med 252 dage. Udbetalingsbeløbet i henhold til denne bestemmelse må, tillige med eventuel anden lønindkomst/skattepligtigt overskud fra erhvervsvirksomhed, dog aldrig overstige det af landsstyret fastsatte udbetalingsbeløb."

10) § 11, stk. 4 ophæves.

11) § 12, stk. 3 affattes således:
"**Stk. 3.** For forsikringstagere på fiskevirksomheder bliver forsikringsudbetalingen regnet hver 4. uge fra og med 33. ledighedstime. For forsikringstagere, som efter aftale ikke arbejder fuld tid, bliver forsikringsudbetalingen regnet efter et forholdsmæssigt lavere timetal. Bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen fastsætter nærmere regler om, hvilke fiskevirksomheder omfattes af bestemmelsen."

12) § 12 a, stk. 2 affattes således:
"**Stk. 2.** Bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen fastsætter nærmere regler om længde af tidsrum, arten af arbejdet eller uddannelseskurser og øvrige betingelser. Bestyrelsen kan give ekspeditionskontoret tilladelse til at træffe beslutning om sådan støtte."

13) Efter § 12 a. indsættes:
"**§ 12 b.** For arbejde, som arbejdsløshedsordningen anviser i udenlandet, kan bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen fastsætte nær-

ingina og arbeiðsávísingina áseta nærri reglur um, at inntøka, sum er vunnin uttanlands ella umborð á altjóða skrásettum skipi, skal telja við í inntøkugrundarlagnum sambært § 11."

14) Aftaná § 12 b verður sett:
"**§ 12 c.** Stýrið fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina kann áseta nærri reglur um veiting frá arbeiðsloysistryggingini til fólk í farloyvi frá einum føstum starvi.
Stk. 2. Veiting undir farloyvi kann í mesta lagi verða givin fyri eitt ávíst tíðarskeið millum 3 og 6 mánaðir.
Stk. 3. Veiting undir farloyvi eigur at verða givin við tí treyt, at annað fólk, sum er tøkt í arbeiðsávísingini, verður sett í staðin í sama tíðarskeið og undir sonnu treytum.
Stk. 4. Reglurnar, sum ásettar verða eftir hesi grein, skulu góðkennast av landsstýrinum."

15) § 13 verður orðað soleiðis:
"Verður arbeiði til tryggingartakaran ávíst av arbeiðsávísingini, ella fær hann á annan hátt arbeiði, sum varir í mesta lagi eina viku, verða bíðidagarnir í § 12 ikki taldir við í útrokningini av tryggingarútgjaldi."

16) § 14 verður orðað soleiðis:
"Rætturin til tryggingarútgjald fellur burtur, tá tryggingartakari í undanfarna 3 ára skeiði hevur fingið útgjald í 504 dagar, ella flytir av landinum."

17) Aftan fyri § 15, stk. 8 verður sett:
"**Stk. 9.** Um so er, at landsstýrið einki skikkað uppskot fær til stýrislim sambært 1. stk. velur landsstýrið stýrislimin uttan uppskot frá feløgunum tó soleiðis, at løntakarar og arbeiðsgevarar verða umboðaðir best møguligt.
Stk. 10. Stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina verður heimilað at lata umboð fyri Felag Teirra Arbeiðstøku luttaka

mere regler om, at ordningen giver økonomisk støtte til rejseudgifter.
Stk. 2. På samme måde som i stk. 1 kan bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen fastsætte nærmere regler om, at indtægt, der er indtjent udenlands eller ombord på internationalt registrerede skibe, skal tælle med i indtægtsgrundlaget i henhold til § 11."

14) Efter § 12 b indsættes:
"**§ 12 c.** Bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen kan fastsætte nærmere regler om ydelse fra arbejdsløshedsforsikringen til personer med orlov fra et fast arbejde.
Stk. 2. Ydelse under orlov kan højst gives for et bestemt tidsrum mellem 3 og 6 måneder.
Stk. 3. Ydelse under orlov skal gives på den betingelse, at en anden person, der er ledig i arbejdsanvisningen, ansættes i stedet i samme tidsrum og på samme betingelser.
Stk. 4. Bestemmelserne, der fastsættes efter denne paragraf, skal godkendes af landsstyret."

15) § 13 affattes således:
"Hvis arbejdsanvisningen anviser forsikringstageren arbejde, eller hvis han på anden måde får arbejde, der varer højst en uge, medregnes ventedagene i § 12 ikke i udregningen af forsikringsudbetaling."

16) § 14 affattes således:
"Retten til forsikringsudbetaling bortfalder, når forsikringstager i den foregående 3 års periode har modtaget udbetaling i 504 dage, eller flytter til udlandet."

17) Efter § 15, stk. 8 indsættes:
"**§ 15, stk. 9.** Hvis landstyret ikke får egnet forslag til bestyrelsesmedlem i henhold til stk. 1, vælger landsstyret bestyrelsesmedlemmet uden forslag fra foreningerne, dog

sum eygleiðarar á fundum stýrisins."

18) § 16, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"**Stk. 3.** Útreiðslur av umsitingini av arbeiðsloysistryggingini og arbeiðsávísingini verða liggjaðar burtur av gjøldum, sum nevnd eru í 2. kapitli."

19) § 18, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Avgreiðslustovan umsitur arbeiðsávísingina sambært § 16."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Broytingarnar í § 1, stk. 1, § 1, stk. 3, litra b, § 2, stk. 2, § 3, stk. 1, § 4, stk. 1, § 11, stk. 4, § 12, stk. 3, § 12 b og § 12 c fáa tó ikki gildi fyrr enn 1. apríl 1994.

sådedes at lønmodtagere og arbejdsgivere såvidt muligt er repræsenteret.

Stk. 10. Bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen bemyndiges til at tillade, at repræsentanter for Felag Teirra Arbeiðstøku kan være observatører på bestyrelsens møder."

18) § 16, stk. 3 affattes således:
"**Stk. 3.** Udgifter i forbindelse med administrationen af arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen finansieres af de indbetalinger, som er nævnt i kapitel 2."

19) § 18, stk. 1 affattes således:
"Arbejdsanvisningen bliver administreret af ekspeditionskontoret i henhold til § 16."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelse. Ændringerne i § 1, stk. 1, § 1, stk. 3, litra b, § 2, stk. 2, § 3, stk. 1, § 4, stk. 1, § 11, stk. 4, § 12, stk. 3, § 12 b og § 12 c træder dog først i kraft 1. april 1994.

Viðmerkingar.

Síðan 1. august 1992 hevur arbeiðsloysisskipanin goldið út stuðul til arbeiðsleys. Sum áður er boðað frá, so hevur ætlanin verið at gjørt ymiskar broytingar og tillagingar í sjálvari lógini. Stýrið fyri skipanina hevur sent landsstýrinum uppskot um neyðugar broytingar.

Harumframt mælir landsstýrið til ávísar broytingar.

Landsstýrið mælir til, at tryggingarútgjaldið fyri fólk, ið starvast á fiskavirkjum verður roknað 4. hvørja viku í staðin fyri hvørja viku. Hetta fer at lætta um umsitingarliga, umframt at hetta gevur eitt meira rættvíst grundarlag.

Landsstýrið mælir somuleiðis til, at "Felag teirra Arbeiðstøku" fáa við stýrisins heimild møguleika sum eygleiðarar at luttaka á stýrisfundum. Hetta gevur teimum arbeiðsleysu møguleika at føra egnu sjónarmið fram.

Triðja broytingin landsstýrið mælir til er, at stýrið fær heimild til at seta í verk eina farloyvisskipan, har fólk við veiting frá skipanini kunnu søkja eitt tíðaravmarkað farloyvi, treytað av, at ein arbeiðsleysur ávístur av skipanini fær starvið viðkomandi umsøkjari situr

í, um annars førleikakrøvini eru til staðar.

Broytingin í § 1 er, at veitingar, sum eru endurgjald fyri mista lønarinntøku, verða roknaðar sum arbeiðsloysistryggjað inntøka. Fólk, ið hava slíkar inntøkur, verða nú limir eisini í hesum tíðarskeiðinum, tá tey bert hava slíkar inntøkur. Hetta eru veitingar fyri lønarmiss frá eitt nú Almannastovuni og Føroya Vanlukkutrygging. Í slíkum førum gjalda Almannastovan og Føroya Vanlukkutrygging arbeiðsgevaragjald.

Stýrinum verður somuleiðis heimilað at áseta nærri reglur um, at skipanin kann rinda fíggjarligan stuðul til ferðakostnað fyri arbeiði, sum arbeiðsloysisskipanin ávísir uttanlands.

Viðvíkjandi vali av stýrislimum, so kann landsstýrið velja lini í stýrið, um so er, at feløgini á arbeiðsmarknaðinum ikki koma við skikkaðum uppskoti.

Annars eru aðrar tekniskar og málsligar broytingar, og víst verður til viðmerkingarnar til tær einstøku greinarnar.

Fíggjarkreppan í skipanini vísir við seinastu framrokningum, sum eru gjørdar saman við Hagdeildini, at talan er um ein likviditetsvørv, sum seinast í 1994 kemur upp á uml. 40 mió. kr., og sum síðani vendist.

Landsstýrið hevur kannað møguleikan, at skipanin í Føroya Banka, Sjóvinnubankan og Føroya Sparikassa fær ein rætt til at trekkja uppá eitt lán, sum í mesta lagi er 15 mió. kr. í hvørjum peningastovni.

Peningastovnarnir eru sinnaðir at játta hesum, tó við m.a. teirri treyt, at landskassaveðhald verður givið.

Harumframt vilja peningastovnarnir eisini seta sum treyt, at afturgjaldið av stovnsfæunum hjá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum verður flutt eitt ár. Gjaldið 1. apríl 1995 verður í staðin 1. apríl 1996. Gjaldið 1. apríl 1996 verður í staðin 1. apríl 1997.

Av somu orsøk kann arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin ikki fara at gjalda út fyrr enn 1. apríl 1997 í staðin fyri 1. januar 1997.

Í samband við, at peningastovnarnir vilja seta sum treyt fyri láninum, at landskassin veðheldur, og at hetta sambært avtaluni millum donsku stjórnina og landsstýrið frá 12. oktober 1993 ikki kann gerast, uttan at stjórnin hevur givið loyvi, hevur landsstýrið søkt um hetta.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

ad. 1) Avlamispensjónistar verða undantiknir kravinum um og møguleikanum fyri limaskapi. Veitingar, sum eru endurgjald fyri mista lønarinntøku, verða roknaðar sum arbeiðsloysistryggjað inntøka og fólk, ið hava slíkar inntøkur, verða nú limir eisini í tíðarskeiðunum, har tey bert hava slíkar inntøkur. Hetta eru veitingar fyri t.d. lønarmiss frá eitt nú Almannastovuni og Føroya Vanlukkutrygging. Fyri at fáa útgjald, er tað tó ein treyt, at ein er tøkur á arbeiðsmarknaðinum.

Einkjupensjónistar verða ikki longur undantiknir møguleikanum fyri og kravinum um limaskap; men hetta merkir tó ikki, at sjálv einkjupensjónin er at meta sum arbeiðsloysistryggjað inntøka. Arbeiðsloysistryggjað inntøka er øll løn, og allar veitingar, sum eru endurgjald fyri mista lønarinntøku hjá limunum í tryggingini. Limir í tryggingini eru allir pensjónsmóttakarar, ið ikki beinleiðis eru undantiknir í § 1. Pensjón verður ikki roknað sum arbeiðsloysistryggjað inntøka.

ad. 2) Sum nú er heldur tryggingin uppat, tá ið hin tryggjaði gerst óarbeiðsførur. Við íógarbroytingini í § 1, 1. stk., eru tey, ið gerast varandi óarbeiðsfør (avlamispensjónistar) undantikin limaskapi. Tey, ið eru fyribils óarbeiðsfør (sjúkradagpeninga- og barnsburðardagpeningamóttakarar), varðveita limaskapin í tryggingini, eisini fyri ta tíð, tey fáa slíkar veitingar, sí ad. 1), § 1, stk. 3, litra b, sum sostatt ikki hevur nakran týdning longur verður tí strikað.

ad. 3) Lánið úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum verður útsett í 1 ár.

ad. 4) Broytingin í § 3, 1. stk., er komin av tí, at endurgjald fyri mista lønarinntøku nú eisini verður roknað sum arbeiðsloysistryggjað inntøka. Sí ad. 1).

ad. 5) Teknisk broyting.

ad. 6) Sí ad. 1) og ad. 4).

ad. 7) Sí ad. 1).

ad. 8) Reglurnar í § 8, 4. stk., um farloyvisskipanina verða broyttar soleiðis, at øll nú kunnu nýta tær og ikki sum higartil einans tey, ið eru sjálvstøðug vinnurekandi.

ad. 9) Teknisk og málslig broyting.

ad. 10) Sí ad. 1). Serreglur fyri avlamispensjónistar verða strikaðar.

ad. 11) Fyri tryggingartakarar á fiskavirkjum verður tryggingarútgjaldið framyvir roknað 4. hvørja viku frá og við 33. arbeiðsloysistíma, og ikki sum higartil einaferð um vikuna frá og við 9. arbeiðsloysistíma.

ad. 12) Stýrið fær heimild til at "delegera" sína heimild til at geva stuðul.

ad. 13) Í § 12 b), 1. stk., verður givið stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina heimild at áseta nærri reglur um, at skipanin rindar fíggjarligan stuðul til ferðakostnað fyri arbeiði, sum arbeiðsloysisskipanin ávísir uttanlands. Somuleiðis kann stýrið sambært 2. stk. áseta nærri reglur um, at inntøka, sum vunnin er uttanlands ella umborð á altjóða skrásettum skipi, skal verða roknað uppí inntøkugrundarlagið sambært § 11.

ad. 14) Greinin gevur stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina heimild til at áseta nærri reglur um veiting frá arbeiðsloysisskipanini til fólk, ið fara í

farloyvi úr einum føstum starvi. Landsstýrið skal góðkenna hesar reglur.

ad. 15) § 13 verður broytt soleiðis, at fyri alt arbeiði, ið varir í mesta lagi eina viku, verða bíðidagarnir í § 12 ikki reknaðir uppí útrokningina av tryggingargjaldinum og ikki sum nú, har talan hevur verið um arbeiði, sum arbeiðsloysisskipanin hevur ávíst.

ad. 16) Tekniskar og málsligar broytingar.

ad. 17) Komi feløgini á arbeiðsmarknaðinum ikki við skilskaðum uppskoti til stýrislim, verður skotið upp at broyta reglurnar soleiðis, at landsstýrið kann velja stýrislimir uttan uppskot frá avvarðandi felag.

ad. 18) Tekniskar og málsligar broytingar.

ad. 19) Tekniskar og málsligar broytingar.

1. viðgerð 21. mars 1994. Málið varð beint í arbeiðaramálanevndina, sum 23. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 4. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 21. mars beint í arbeiðaramálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt fund við Jákup Nielsen, landsstýrisfulltrúa fyri at lýsa ymisk viðurskifti gjøllari.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Heini Johansen, Hildur Patursson og Helena Dam á Neystabø) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Birgir Danielsen) hevur hesar viðmerkingar:

Landsstýrið ger í lógaruppskotinum nakrar broytingar, sum ganga longri enn skotið varð upp av stýrinum, t.d. ein farloyvisskipan, sum ongar fíggjarligar konsekvensútrokningar eru gjørdar fyri. Tað kann virka villleiðandi, tá landsstýrið í sínum viðmerkingum sigur, at "talan er um ein likviditetstørv, sum seinast í 1994 kom upp á umt. 40 mió., og sum síðani vendist." Hertil er at siga, at fortreytirnar fyri hesi meting eru óvissar. Útrokningar mugu gerast við alternativum fortreytum. Kostnaðurin av farloyvisskipanini er ikki roknaður, og ongar metingar eru um, hvat skipanin kostar.

Stríð hevur sum kunnugt tikið seg upp millum landsstýrið og skipanina um lántøku. Eitki røkist fyri, at landsstýrið hevur vilja til at finna eina loysn á hesum. Hararturímóti herðir hetta uppskotið bert stríðið, sum endar við fíggjarligum ruðuleika innan skipanina.

Tey arbeiðsleysu detta yvir á forsorgarlógina. Hesum er ikki tikið hædd fyri í fíggjarlógini

fyri 1994.

Tí tekur minnilutin (Birgir Danielsen) ikki undir við uppskotinum. Annars verður víst til løgtingsmál nr. 128/93: Veðhald fyri láni til Arbeiðsloysistryggingina og Arbeiðsávísingina.

Minnilutin (Jógvan I. Olsen) tekur ikki undir við málinum.

2. viðgerð 7. apríl 1994. Málið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

FL jnr. 1335-3/91.

134 Broyting í løgtingslóg um arbeisloysistrygging og arbeiðsávísing

Ár 1994, fríggjadagin 4. mars legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 17 frá 10. mars 1992, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 108 frá 21. mai 1993, verður gjørd hendа broyting:

Aftaná § 15 verður sett:

"**§ 15 a.** Um inngjøldini í arbeiðsloysistryggingina ikki nøkta gjaldføristørvin, er heimilað landsstýrinum at tryggja skipanini gjaldføri við lántøku o.a.m."

lagtingslov om ændring i lagtingslov og arbejdsløshedsforsikring og arbejdsanvisning.

§ 1.

I lagtingslov nr. 17 af 10. marts 1992, som senest ændret ved lagtingslov nr. 108 af 21. maj 1993, foretages følgende ændring:

Efter § 15 indsættes:

"**§ 15 a.** Såfremt indbetalingerne til arbejdsløshedsforsikringen ikke er tilstrækkelige til at sikre likviditetsbehovet, har landsstyret hjemmel til at sikre forsikringens likviditet ved låntagning m.v."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Sambært § 15 í lógini um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing er tað stýrið fyri arbeiðsloysistryggingini og arbeiðsávísingini, sum skal sita fyri og hava ábyrgdina av arbeiðsloysisskipanini.

Vegna tess, at stýrið ikki hevur tikið neyðug stig til tess at tryggja gjaldførið hjá arbeiðsloysisskipanini samsvarandi ætlan landsstýrisins, soleiðis at tryggingarnitgjøldini verða í samsvar við galdandi reglur, verður skotið upp at broyta lógina um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávising soleiðis, at landsstýrið fær heimild at taka avgerðir stýrisins vegna, sum tryggja gjaldførið.

1. viðgerð 4. mars 1994. Málið varð beint í arbeiðaramálanevndina, sum 4. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 4. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 4. mars 1994 beint í arbeiðaramálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilutа og tveir minnilutar.

Meirilutin (Heini Johansen, Hildur Patursson og Karl Heri Joensen) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Birgir Danielsen) tekur undir við málinum, treytað av, at samtykt verður soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at útvega trygd fyri, at stýrið fyri Arbeiðsloysistryggingina framvegis skal kunna virka, at álagt verður landsstýrinum at taka neyðug stig fyri at fáa samanhang í millum Arbeiðsloysisskipanina og figgjarlógina (forsorgsskipanina) og at landsstýrið yvirtekur lánið seinni.

Víst verður annars til minniluta álit í løgtingsmálinum 128/1993: Veðhald fyri láni til Arbeiðsloysistryggingina og Arbeiðsávísingina.

Minnilutin (Jógvan I. Olsen) tekur ikki undir við málinum.

2. viðgerð 4. mars 1994. Uppskotið frá minnilutanum fall við 2-0 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins samtykt 17-0 atkvøðum.

3. viðgerð 4. mars 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

Lóg nr. 22 frá 4. mars 1994.

135 Vernd móti uppsøgn, orsakað av felagslimaskapi

Ár 1994, friggjadagin 18. mars legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um vernd móti uppsøgn orsakað av felagslimaskapi.

§ 1. Arbeiðsgevari kann ikki siga úr starvi ein lønarmóttakara, tí at hesin er limur av einum felag ella av einum ávísum yrkisfelag.

§ 2. Arbeiðsgevari kann ikki siga úr starvi ein lønarmóttakara, tí at hesin ikki er limur av einum felagsskapi ella av einum ávísum yrkisfelagsskapi.
2. stk. Visti lønarmóttakarin við setanina, at arbeiðsgevarin setti krøv um limaskap av einum felag ella ávísum yrkisfelagsskapi sum treyt fyri arbeiði í virkinum, kann 1. stk. ikki nýtast.
3. stk. Tá lønarmóttakari verður gjørdur kunnugur við, at limaskapurin er ein treyt fyri framhaldi av setanini í virkinum, kann 1. stk. ikki nýtast.

fagtingslov om værn mod opsigelse grundet af medlemskab.

§ 1. En arbejdsgiver må ikke afskedige en lønmodtager, fordi denne er medlem af en forening eller af en bestemt fagforening.

§ 2. En arbejdsgiver må ikke afskedige en lønmodtager, fordi denne ikke er medlem af en forening eller af en bestemt fagforening.
Stk. 2. Stk. 1 finder ikke anvendelse, såfremt lønmodtageren ved ansættelsen var bekendt med, at arbejdsgiveren stillede medlemsskab af en forening eller af en bestemt fagforening som betingelse for beskæftigelse i virksomheden.
Stk. 3. Stk. 1 finder endvidere ikke anvendelse, når en lønmodtager, der er medlem af en forening, efter ansættelsen gøres bekendt med, at medlemsskabet er en

betingelse for fortsat ansættelse i virksomheden.

§ 3. §§ 1 og 2 í lógini eru ikki galdandi fyri lønarmóttakarar, sum eru í starvi hjá einum arbeiðsgevara, hvørs virki hevur sum sítt lýsta endamál at fremja eina ávísa politiska, hugsjónarliga, átrúnaðarliga, ella mentannarliga støðu, og viðurskiftini hjá avvarðandi mugu haldast at vera av týdningi fyri virkið.

§ 3. Lovens §§ 1 og 2 gælder ikke for lønmodtagere, der er ansat hos en arbejdsgiver, hvis virksomhed som sit udtrykte formål har at fremme et bestemt politisk, ideologisk, religiøst eller kulturelt standpunkt, og den pågældende foreningsforhold må anses for at være af betydning for virksomheden.

§ 4. Verður ein lønarmóttakari fmóti §§ 1 og 2 sagdur úr starvi, skal arbeiðsgevarin rinda endurgjald.
2. stk. Endurgjaldið eftir 1. stk., sum ikki kann fara upp um lønina fyri 78 vikur, verður ásett uttan mun til lønarmóttakarans setanartíð og málsviðurskiftini annars.

§ 4. Afskediges en lønmodtager i strid med §§ 1 og 2, skal arbejdsgiveren betale erstatning.
Stk. 2. Erstatningen efter stk. 1, der ikke kan overstige 78 ugers løn, fastsættes under hensyn til lønmodtagerens ansættelsestid og sagens omstændigheder iøvrigt.

§ 5. Lógin kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

§ 5. Loven træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar

Nú so hart leikar á í øllum búskapinum, er umráðandi, at løntakarar í almenna sektorinum eins og í vinuni eru so væl vardir sum møguligt móti ágangi frá arbeiðsgevarum og fakfeløgum. Uppsagnir eru gerandiskostur, og yrkisfeløgini ganga eisini hart á inn- og úteftir til tess at tryggja síni felagsligu áhugamál. Lønatakarin kemur ofta í smeliuna.

Hetta lógaruppskot um vernd móti uppsøgn av fólki orsakað av fakfelagslimaskapi er í tráð við ST-mannarættindarreglur og við § 11 í Europeisku konventiónini um mannarættindi, sum ikki hert tryggja øllum borgarum í samfelagnum rættin at skipa seg í fakfeløg, men eisini rættin til at standa óheft av yrkisfelag.

Frælsið at standa óheftur er staðfest í fleiri nógv umtalaðum dómum við mannarættindadómstólin í Strassbourg, hagar fólk leitaðu sær skjól undan fakfelagstvingsuli og uppsøgn úr arbeiði, tí viðkomandi persónar av samvitskugrundum ikki vildu líða undir yvirgangi av diktatoriskum eksklusiv-sáttmálum.

Á føroyska arbeiðsmarknaðinum eru dømi um eksklusiv-avtalur, sum skerja menningina á viðkomandi virkisøki, darvandi virkisfrælsið hjá einstaka yrkisfelagsliminum, og sum kostar samfelag og løntakarum pening av verkfallstapum.

Í flestu framkomnu londum verja lógir sum benda lønarmóttakarar móti tvingsli, tryggja lønmóttakarar fmóti upsøgn orsakað av limaskapi ella ikki-limaskapi í fakfelag. Í Danmark kom lógin í gildi í juni 1982, og legði Svend Auken vegna donsku javnaðarsjórnina tá uppskotið fyri fólkatingið, sum samtykti tað, so tað gjørdist og er nú lóg.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í arbeiðaramálanevndina, sum 22. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Óla Breckmann, løgtingsmanni tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1994 beint í arbeiðaramálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Heini Johansen, Hilður Patursson, Helena Dam á Neystabø og Jógvan I. Olsen) tekur ikki undir við málinum, og vísir á gjørdar avtalur millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Minnilutin (Birgir Danielsen) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið fall við 5 0 atkvøðum.

136 Reglur fyri fosturdiagnostikki

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Niels Pauli Danielsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at gera greiðar reglur fyri fosturdiagnostikki, ið seta bann fyri tí slagi, ið einans hevur til endamáls longu í móðurlívi at velja út tey børn, sum hava álvarsamt brek ella sjúku, til møguliga týning, og somuleiðis seta bann fyri diagnostiskum hátti, sum ber í sær vanda fyri at elva til sjálvkravda misføðing ("spontan abort").

Viðmerkingar

Tøknin tekur seg fram við risastigum, og menniskjar noydist alla tíðina at vera á varðhaldi og ansa eftir, at vit ikki gerast trælir hjá eini tøkn, sum skuldi verið tænari okkara heldur enn harri.

Tann tøknin, sum á fyrstantíð varð nýtt til fosturdiagnostik, kom ein australskur granskari við, sum vildi bjarga livinum hjá einum rhesusbarni.

Hátturin varð við øðrum orðum til fyri at grøða sjúklingin.

Ein annar granskari, franski professarin í arvafrøði, Jérome Lejeune, ið gjørdi yvirlýsingina, sum er grundstøði hjá øllum Pro Vita-feløgunum, kom í 1958 fram á eyka kromosomið (nr. 21), sum er orsøkin til mongolismu. Um útlitið fyri nútíðar fosturdiagnostik hevur hann sagt: "Prænatal (fyri føðing) diagnostikur vil kunna fá sera stóran týdning fyri viðgerð og hevur tað longu í einstøkum førum. Nakað heilt annað er, at ávís lond í dag hava samtykt lógir, ið loyva at drepa fostrið í móðurlívi.

Harvið ert tú farin undir eitt slag av vinloysisgongd, sum hevur fingið ávísar læknar til at hugsa soleiðis: Av tí at eg eri førur fyri at finna eina sjúku á fosturstigi, men ikki enn kann lekja hesa sjúku, má eg sláa sjúklingin í hel. Ein tílíkur hugsunnar- og virkisháttur førir í roynd og veru til undirgongd fyri læknavísindina. Læknavísindin er til fyri at striðast móti sjúkum og má soleiðis altíð vera í parti við sjúklinginum. Tann hugsanin, at tú skal beina fyri einum sjúklingi, sum tú ikki kanst grøða, er sostatt beint ímóti øllum tí, sum eitur medisin. Tey, sum koma við uppskoti um nakað sovorðið, tala fullkomiliga sum teir, sum í fornum tíðum skutu upp, at tey pestfongdu áttu at verðið brend inni í húsum sínum, ella at fólk við hundaøði skuldu verðið kvald millum tvær madrassur. Ja, tað var ein tíð, tá ið fólk vórðu brend, tí at eingin kundi lekja tey fyri pest, og onnur kvald, tí at Pasteur var enn ikki komin fram á koppingarevni móti hundaøði, men eitt kunnu vit vera vís í: Tað vóru ikki tey, ið kvaldu sjúklingarnar við hundaøði, ella teir, sum brendu tey pestraktu, sum fríaðu mannaættina fyri pest og hundaøði. Tað vóru harafturímóti tey, sum settu sær fyri at beina fyri sjúkdóminum og ikki teimum sjúku. Sjálvt eitt leysligt eygnabrá á søguna hjá læknavísindini vil vátta hetta."

Danmørk sigst hava sett heimsmet, tá ið tað snýr seg um kanningar av óføddum børnum. Útvið 12% av øllum kvinnum, sum eru upp á vegin, koma á hvørjum ári til eina fosturdiagnostiska kanning. Í Svøríki er talið 4,7% og Noregi 2%.

Hesar kanningar eru tó ikki heilt vandaleysar. 1-2,5% kasta óvilja burtur eftir at hava verið igjøgnum fosturdiagnostiskar kanningar.

Allar kvinnur, sum eru við barn, fáa í Danmørk og Føroyum tilboð um foturdiagnostik, um tær eru farnar um 35 ár (ella pápin er meira enn 50), og mett annars verður, at møguleiki er fyri barni við arvaligum ella øðrum breki.

Landslæknin sigur frá í brævi til rættarnevnd løgtingsins hin 31. mars 1992 í samhandi við uppskot Kristiliga fólkafloksins Føroya framburðs- og fiskivinnuflokks, um broyting í log um fosturtøku (løgtingsmál nr. 85/1991), at fosturvatnkanningar hava verið gjørdar í Føroyum síðani 1983, og leggur landslæknin afturat, at eingin av hesum kanningunum enn hevur havt ta avleiðing, at fosturtøka varð gjørd.

Landslæknin sigur í hesum sama brævi, at hann heldur tað vera skeivt "at banna fosturvatnskanningum, av tí at hesar hjá ávísum fólkum og í ávísum aldursbólkum kunnu geva foreldrum, ið kanska himprast við at fáa sær børn, eitt nú orsakað av vandanum fyri álvarsomum arvaligum brekum ella møguligum sjúkum, møguleikan fyri at fáa børn uttan óvissu um sík møgulig álvarsom brek hjá barninum."

Fosturtøkurnar eru minkaðar í Føroyum tey seinastu árini. Sambært ársfrágreiðingini hjá landslæknanum vórðu á teimum føroysku sjúkrahúsunum framdar í

1992: 60 fosturtøkur
1991: 58 "
1990: 81 "
1989: 95 "

Upplýsandi felløg, sum Føroya Pro Vita gera eitt stórt og gott arbeiði við at vísa á aðrar lívsjáttandi loysnir sum t.d. ættleiðing, og stuðla tey við sakkønari vegleiðing frá læknum, sjúkrasystrum, jarðarmøðrum o.ø. og veita harumframt aðra hjálp.

Lívið hoyrir Gudi til, og hava vit tað bara til láns. Tí er neyðugt við virðing og ábyrgd fyri lívinum frá byrjan til náttúrligan enda.

Móðurlívið er tryggur staður fyri tað lítla barnið, halgidómur tess, sum onkur hevur tikið til, og tað eiga vit at virða, eins og vit varðveita virðingina fyri tí einstaka mannalívinum, so ymisk vit øll eru hvør í sínum lagi.

Tað eigur eisini hin framkomna tøkni at hoyggja seg fyri.

Vit kunnu ikki vera eitt samfelag, ið loysir figgjarligar og sosialar trupulleikar við at beina fyri mannalívi og gera tað ótrygt hjá øllum, sum eru øðrvísi, og sum tað kann verða sagt um, at tey kosta samfelagnum pening.

Longu í tríati árunum var stórt samfelagskjak í Danmark um hesar spurningar, har m.a. prestaskaldið Kaj Munk, ið týskarar myrdu, gekk hart ímóti frían fosturtøku og sá fyri sær "drabspavillioner indrettet i alle stationsbyer".

"Eitt barn verður til, fyri at tað skal verða føtt, ein kvinna gitin, fyri at hon skal verða móðir. Alt annað er brotsgerð og svínarí", sigur Kaj Munk.

Í nøkrum londum eru teir farnir rættiliga á glið.

Í USA verður talað beint fram, um at geva loyvi til, at nýføðingar við breki verða avlívaðir. Og tað er ikki so langt síðani, at danski heilsuspekingurin Niels Holtug í "Ugeskrift for læger" skeyt upp at gera tað sama, tí hann dugdi ikkki at sígja nakran mun á einum fostri og nýføðingi. Longu í 1971 tekur rithøvundurin J. Leach málið upp í bókini "Biokratarnir" og sigur, at vit kanska verða noydd til at gera av, nær ið eitt barn gerst limur í samfelagi okkara, og t.d. geva tí einar tveir ella trígjar dagar ella vikur sum "royndarlív", so at læknarnir fáa kannað, um barnið hevur brek, og foreldrini fáa tikið støðu til, um tey ynskja at eiga og

uppala eitt brekað pinkubarn ella ikki.

Vanvirðingin av tí óføddu lívinum fær soleiðis eisini avleiðingar fyri tað fødda lívið, og vit nærkast tí sjónarmiði, sum fekk Nazi-Týskland at beina fyri øllum teimum, ið veik vóru og nevndust ónytnir. Hvar enda vit tá? Hvussu verður við umsorgan okkara fyri teim brekaðu?

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið vard beint í rættarnevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1994 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við landslæknan. Nevndin tekur ikki undir við málinum.

Ásannandi at eingin fosturtøka er framd í Føroyum orsakað av fosturdiagnostikki, metir rættarnevndin ikki, at tað er rætt at seta bann fyri ávísari læknaligari kanning.

Rættarnevndin metir ikki, at tað er orsøk til at leggja heilsuverkið undir illgruna at fremja óetiskan atburð, soleiðis sum tað tykist ganga fram av viðmerkingum uppskotsstillarans.

2. viðgerð 22. apríl 1994. Uppskotið fall við 6-0 atkvøðum.

137 Sjálvboðin uppsparing við skattafrádrátti

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um sjálvboðna uppsparing við skattafrádrátti.

§ 1. Persónar undir fullari skattskyldu í Føroyum kunnu hvørt inntøkuár seta inn á serliga bundna konto í føroyskum peningastovni upp til kr. 20.000 og draga upp-

lagtingslov om frivillig opsparing med skattefradrag.

§ 1. Personer, der har fuld skattepligt på Færøerne, kan for hver indtægtsår indsætte op til kr. 20.000 på særlig bunden konto i færøsk pengeinstitut og fradrage dette beløb

hæddina frá skattskyldugu inntøkuni sama ár, hon er inngoldin.

§ 2. Verða tær einstøku inngoldnu upphæddirnar tiknar út, áðrenn 3 ár eru liðin eftir inngjalding, verður frádrigna upphæddin tald upp í skattskyldugu inntøkuna tað árið, peningurin verður úttikin.

§ 3. Frá fjórða ári, eftir at skattgjaldarin er byrjaður at spara upp eftir hesi skipan, verður loyvt at taka út av bundnu kontoini bert upphædd, svarandi til upphæddina fyrsta innsetingarárið uttan so, at úttikna upphæddin verður nýtt til:

1. Íløgu í nýstovnað virki skattgjaldarans.
2. Íløgu í nýkeypt sethús, til egna nýtslu og bert eina ferð.
3. Nýtast til at gjalda útreiðslur í sambandi við útbúgving, sum tekur minst 2 ár at fullføra.
4. Úttøku 4 ár eftir innsetingardagin.

§ 4. Henda lóg fær gildi dagin eftir kunngerð.

i den skattepligtige indtægt samme år, indbetalingen er foregået.

§ 2. Såfremt de enkelte beløb hæves inden 3 år efter foretagen indbetaling, skal det fratrukne beløb medregnes i indtægten det samme år, om beløbet er hævet.

§ 3. Efter det fjerde år at skatteyderen har påbegyndt opsparing i henhold til denne ordning, er det kun tilladt at hæve så meget af den bundne konto, der modsvarer beløbet det første indskudsår, dog med undtagelse for at det hævede beløb er anvendt til:

1. Investering i en af skatteyderen nyetableret virksomhed.
2. Investering i nykøbt beboelsesejendom til eget brug og kun een gang.
3. Anvendes til at betale udgifter i forbindelse med uddannelse, der kræver en uddannelsestid på mindst 2 år.
4. Hævelse af beløb, der har været indsat på konto i mindst 4 år.

§ 4. Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar

Uppskotið hevur tvinni endamál:

1. At steðga fíggjarligu ørmaktanini, sum almenna eyðræningin av føroyskum skattgjaldarum førir til.

2. At styrkja vinnuligu og privatu táttin í búskapinum mótvegis tí almenna.

Uppskotið tekur útgangsstøði í verandi skattaskipan við progressivum skattastiga heilt upp í lemjandi 76% í marginalskatti og í verandi frádráttarskipan. (Hetta uppskot kann endurskoðast, um løgtingið samtykkir uppskot fólkafloksins nr. 78/1993 um m.a. lækking av skattatrýsti, av kostnaðarstøði og umlegging til 20% bruttoskatt, tí tað hevði eisini ført til nýggjan trivnað í Føroyum).

Ein sannroynd er, at samlaðu innlánini í føroyskum peningastovnum, sum í 1991 táttaðu upp móti 10 mia. kr., nú eru fallin niður um 7 mia. kr. Talan er sostatt um kapitaldren innanoyggja og kapitalflukt úr Føroyum. Hækkaður rentuskattur og fíggjarognaravgjaldið, til

tess at økja nýtslutørv hins almenna upp a bekostning av íbúgvum landsins. hava gjørt tað høpisleyst at hava sparipening á bók.

Vit hava fingið danskar vinnulógir trýstar niður yvir okkum. so minsti eginpeningur, ið krevst til eitt partafelag, er 800.000 kr. Enn verri er hetta. at einum partafelagi nýtist kr. 300.000 kr. í partapeningi fyri at sleppa niður á tað leviliga skattaprosentið upp á 22, sum varð samtykt, meðan fólkatlokkurin sat við fíggjarmálum í Tinganesi.

Nýggju vinnufíggindaligu krøv hankanna um 25-50% eginpening sum treyt fyri bankafígging av eini verkætlan køva øll útlit fyri vinnuligan framburð og steingja fjøldina av fólki úti frá nakrantið at seta í gongd eitt hvørt vinnuligt tiltak.

Við verandi skattligu knokkroyting av føroyskum skattgjaldarum, nú skattaloftið er burtur. tekur tað føroyskum løntakara 30-40 ár at spara sær eginpening til eitt partafelag saman. Tiskil er hetta uppskot við sjálvbodnari samansparing við skattafrádratti bráneyðugt.

Verður hetta uppskot samtykt, fáa allir landsins borgarar valfrælsi millum at spara hesar 20.000 kr. saman á bók og at noyðast gjalda somu upphædd í skatti. Mannalyndið er so, at flestøll heldur valdu at seta hesa peningahædd inn á bók árliga í trý ár.

Hetta uppskot er inntøkuneutralt, t.d. gevur høgum og lágum inntøkum rætt til sama skattafrádrátt. Tað, sum ein borgari av løgtinginum verður hildin at hava ráð til at rinda í skatti, má ein eisini hava ráð til at seta inn á sparibók. Men uppskotið er sosialt í tann mun, at 20.000 kr. drignar frá skattskyldugu inntøkuni árliga hilnast lutfalsliga nógv hetur hjá fólki við minni inntøkum enn við høgari.

Hetta uppskot er eisini lívsneyðugt, ti allar royndir vísa, at bert vinnuligi átturin í einum samfelag skapar búskaparliga lønsom arbeiðspláss, men almenni sektorurin er virðisterandi og avskeplar búskapin.

Alt eftir hvussu nógv nýta hesa lógartryggjaðu samansparing, førir uppskotið til, at landskassin missir nakað av skattainntøku sini. Men við verandi gongd falla inntøkur hins almenna kortini við økjandi ferð, og tær halda fram at falla, til fortreytirnar fyri kreppuni, nevniliga tað alt ov høga kostnaðarstøðið og skattatrýstið, verða broyttar eftir uppskotum fólkafloksins.

Hin vegin hevði hetta uppskot, um tað verður samtykt, alt fyri eitt ført til, at samansparingin í samfelagnum hevði trilkað aftur. Tíggjutals miljónir árliga. Virkisfús fólk høvdu aftur fingið møguleika at sett pening í vinnuvirkir, sum síðani vórðu nýggj arbeiðspláss í okkara búskapi, sum verður alsamt meir niðurpíndur av sosialistiskum skatta- og vinnupolitikki.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og setir einki uppskot fram.

2. viðgerð 22. apríl 1994. Uppskotið fall við 6-0 atkvøðum.

138 Oljuboringar í Lopra

Ár 1994, friggjadagin 18. mars legði Niels Pauli Danielsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at taka upp aftur boringarnar í Lopra og gera kanningar eisini undir basaltlagnum, nú ið leiting eftir olju og jarðgassi av álvara er við at taka seg upp í føroysku undirgrundini.

Viðmerkingar

Fyrst á áttatiárunum varð farið undir at gera royndarboringar á føroysku landjørðini. Í Vestmanna varð í 1980 borað 660 metrar niður og í Lopra í 1981 heilar 2178 metrar niður.

Boringarnar í Lopra kostaðu 13 mió. kr., sum landsstýrið rindaði tær 12 mió. av. Íslendingar stóðu fyri hesum boringum saman við landsverkfrøðinginum, jarðfrøðissavninum og DGU.

Í 1988-89, tá ið tøknin var betri, vóru seismiskar kanningar gjørdar í Lopra. Hesar kanningar søgdu frá, at 250 metrar longur niðri broytist undirgrundin, uttan at nakar við vissu kann siga, hvat ið har er.

Nú er tøknin uppaftur meira framkomin og áhugin fyri føroysku undirgrundini eisini stórur hjá olju- og jarðgassfeløgum.

Samtíðis er arbeiðsloysið stórt í Føroyum og fíggjarstøðan ring.

Nógv av unga fólki okkara veit sær eingi onnur ráð enn at flyta burtur í onnur lond.

Allar kreftir eiga at verða lagdar í at fáa vent gongdini, og teir møguleikarnir, vit hóast alt

hava. eiga at verða troyttir fólki okkara og landi at gagni. Nakrir av hesum møguleikum liggja í einari oljuvinnu, sum kann útvega nógv arbeiðspláss, men sum samtíðis ikki máa fáa loyvi til at renna aðrar vinnugreinar um koll og føra óneyðuga dálking av umhvørvinum við sær.

Skulu fleiri kanningar gerast á landi, man eingin ivi vera um, at einki er kostnaðarminni enn at bora longur niður í Lopra.

Á fíggjarlógini fyri 1994 eru settar 2 mió. kr. av til fyrisiting av undirgrund umframt tað, sum játtað er til seismiskar kanningar (587 tús.) og samstarvið DGU/Føroya jarðfrøðissavn (655 tús.).

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í Idnaðarnevndina, sum 21. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1994 beint í Idnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt uppskotið, ið mælir til, at vit sleppa teimum forkanningarætlanum, ið løgtingið hevur samtykt, og sum eru komnar áleiðis, og í staðin fyri nýta játtanina á fíggjarlógini sum arbeiðsskapandi tiltøk við beinanvegin at fara undir at bora longur niður í klettin í Lopra.

Sigast má, at hetta uppskot er sera illa undirbygt, og nevndin kann ikki taka undir við tí.

Tað finnast nøkur tekin um kolveiti í Føroyum og tey vit kenna, eru fingin uppi á landi. Tey eru:

- kol, ið liggur í legugrýtislindum millum basaltfláirnar,
- lívrunnið voks, ið knýtt at úrskildum steinsløgum er at finna í poknum og sprungum í basaltinum, og
- smáar nøgdir av gassi, ið seyra úr boriholinum í Lopra.

Í 1983 vóru smáar nøgdir av gassi og olju úr boriholinum í Lopra kannaðar. Úrslitini kunnu siggjast í bókini "The Deep Drilling Project 1980-1981 in the Faroe Islands".

Oljan og gassi úr boriholinum eru aftur í 1992 kannað av nýggjum saman við føroyska basaltinum. Nýggju kanningarnar vísa m.a., at nevnda voks møguliga kann stava frá vanligum koli millum basaltfláirnar, og ikki frá móðurgrýti niðri undir basaltinum (hetta er tó ógvuliga óvist).

Olju- og gasskanningarnar geva heldur ikki nakra heilt vissa ábending um teirra uppruna, og frá sakkønari síðu verður rátt frá at leggja ov stóran dent á hesi tekin av olju og gassi í føroysku undirgrundini.

Vísandi til frammanfyri standandi mælir Idnaðarnevndin til, at løgtingið heldur seg til tann orkupolitikk, ið samtyktur er, og ikki letur seg taka av fótum av bráðkomnum pareta- og

lokalpolitiskum herðindum frá Kristiliga fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og fiskivinnuflokki. Til tess eru møguligu virðini í undirgrundini eftirkomarum okkara ov kostnaðarmikil.

Løgtingið hevur valt eina leið við at geva loyvi til forkanningar av undirgrundini undir Føroyum. Hesi loyvi eru nú givin, og komandi kanningar umfata eisini kanningar í Lopra.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið fall við 3-0 atkvøðum.

139 Frískúlar og privatir grundskúlar v.m.

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars 1994 legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

Løgtingslóg um frískúlar og privatar grundskúlar.

§ 1. Einstaklingum, samkomum, felagsskapum o.ø. er loyvt smbr. hesi rammulóg at seta á stovn frískúlar og privatar grundskúlar, framhaldsdeildir og miðnámsútbúgvingar.

§ 2. Landsstýrið góðkennir stovnsetan av slíkum skúlum eftir somu reglum um m.a. kostnað, næmingatal, lærarakreftir og høliumstøður, sum eru galdandi fyri almennu skúlarnar.

§ 3. Hesir frískúlar skulu í minsta lagi lúka frálærukrøv og prógvstøði fólkaskúlans, men eru annars frítt stillaðir at leggja aftrat innihaldinum smbr. serskildum endamálum frískúlanna.

§ 4. Landsskúlafyrisitingin hevur skyldu at

lagtingslov om friskoler og private grundskoler.

§ 1. I henhold til denne rammelov er det tilladt enkeltpersoner, forsamlinger, fællesskaber o.a. at etablere friskoler og private grundskoler, fortsættelsesafdelinger og centraluddannelser.

§ 2. Landsstyret godkender etablering af sådanne skoler efter samme regler om bl.a. bekostning, elevtal, lærerkræfter og lokaleforhold, som er gældende for de offentlige skoler.

§ 3. Disse friskoler skal i det mindste opfylde folkeskolens undervisningskrav og folkeskolens eksamensgrundlag, men er ellers fritstillet at udvide indholdet i henhold til friskolernes formål.

§ 4. Landsskoleadministrationen har pligt

stuðla við serundirvísing, vegleiðing, frálærutilfari o.ø. í vanligum lærugreinum, har leiðsla hins einstakra frískúlans ynskir tað.

§ 5. Møgulig bygging, keyp ella leiga av egnaðum skúlahølum verður tíggjað av løgtingi og kommunum á sama hátt og : sama mun sum verandi almennir skúlar.

§ 6. Raksturin til hesar skúlar verður tíggjaður á tann hátt, at almenn gjaldsváttan frá landi og kommunum, sum svarar til verandi kostnað av frálæru pr. næming í almennu skúlunum, verður latin foreldrunum, t.e. fylgir barninum, og kann bert brúkast til hetta frálæruendamál.

§ 7. Frískúlarnir hava roknskaparskyldu sum almennir skúlar o.a. stovnar.

§ 8. Foreldraráð og lærarar hava í felag ábyrgd av rakstri og frálæruni á hesum frískúlum.

§ 9. Skúlastjórin hevur ábyrgd av dagliga rakstrinum og roknskaparskyldum hjá frískúlanum.

§ 10. Fylgilógir og reglugerðir verða gjørdar smbr. hesi rammulog í tráð við líknandi frískúlar í grannalondum okkara.

§ 11. Henda lóg fær gildi dagin eftir kunngerð.

til at støtte med specialundervisning, vejledning, undervisningsmateriale m.m. i sædvanlige fag, hvor den enkeltes friskoles ledelse ønsker det.

§ 5. Eventuel opføring eller leje af egnede skolelokaler finansieres af lagtinget og kommunerne på samme måde og i samme forhold som værende offentlige skoler.

§ 6. Driften af disse skoler finansieres på den måde, at offentlig kvittering fra landet og kommuner, som svarer til værende bekostning af undervisning pr. elev i de offentlige skole, udleveres forældrene, d.v.s. følger med barnet og kan kun bruges til dette undervisningformål.

§ 7. Friskolerne har regnskabspligt som offentlige skoler o.a. institutioner.

§ 8. Forældreråd og lærere har i fællesskab ansvar for driften og undervisningen på disse friskoler.

§ 9. Skoledirektøren har ansvaret af den daglige drift og friskolens regnskabspligt.

§ 10. Følgelove og reglementeer formuleres i henhold til denne rammelov sammenlignet med friskoler i vores nabolande.

§ 11. Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar

Endamálini við hesi lóg eru:

1. At geva foreldrum og børnum møguleika at velja sær besta skúlan og útbúgvingina, um tey eru ikki nøgd við almenna eindarskúlan ella hava hug til, at børnini skulu fáa serskilda vitan umfram vanliga útbúgving.

2. At samfelagið fær meir nytta og betri gagnnýtslu burtur úr teim 500 mió. kr., almenna skúlaverkið kostar landi, stati og kommunum árliga, svarandi til 50.000 kr. pr. næming pr. ár.

Lærdómur er lættur at bera. Høgt útbúgvingarstøði er ein hornasteinur undir trivnaði og menning í einum samfelag. Á hesum øki hava føroyingar roynt at hildið okkum á hædd við okkara grannalond í tann mun, fólkagrundarlag, lærarakreftir og fíggjarorka hava loyvt tí.

Men mótsett øðrum londum hava vit sjálv bert rinda helvtargjald av tí, sum skúli og útbúgving í Føroyum hava kostað. Danir hava goldið hin helmingin. Hetta lógaruppskotið hevur ikki til endamáls at broyta hetta tvíbýtið, sum fíggjarvánirnar eru, men er heldur ikki forðan fyri, at kostnaðarbýtið verður broytt.

Heldur miðar uppskotið ímóti at fleirátta møguleikarnar hjá foreldrum at velja tann skúla, ta útbúgving, siðvenju, átrúnað og tað frálærurunnihald, sum best verður tryggjað í eini frískúlaskipan við sjálvstøðugum skúlum á øllum aldurstigum, har foreldur og lærarar, sum yuskja at leggja meir í skúlaskapin enn minstakrav landsmyndugleikanna, fáa høvi til tess.

Eisini hevði ein frískúlaskipan lært okkum at fingið mest innihaldsvirði fyri tann pening, sum okkara samfelag nýtir til at menna kunnleikastøði ungdómsins.

Ein holl skúla- og útbúgvingarskipan kostar einum samfelag nógvan pening. § 14 á løgtingsfíggjarlógini, "Útbúgving og gransking" leggur hald á yvir 350 mió. kr. í hesum fíggjarári. Harumframt kemur kommunanna ískast, sum í fleiri førum umboðar størstu einstøku fíggjarskyldu teirra.

Siga vit, at skúlaskapur falt kostar móti 500 mió. kr. árliga, og at tað eru uml. 10.000 føroyingar í útbúgving, frá 1. flokki í barnaskúlanum upp til handils- ella studentaskúla, kostar hvør næmingur uml. 50.000 kr. árliga.

Fyðvitað kostar hvør eldri næmingur meir enn hvørt barn í fólkaskúlanum, men tað er hugvekjandi at hugsa sær, at ein miðal føroysk skúlastova við t.d. 15 næmingum umboðar ein samfelagskostnað ella íløgu uppá 750.000 kr. árliga, (svarandi til 4 ársinntøkur hjá einum tímalønтum ella 3 læraraársløнir).

Hetta uppskotið miðar móti, at almennu játtanirnar fylgja næmingunum, mótsett verandi skipan, nú almennu játtanirnar til skúlaverkið (undantikið lestrarstoðul) fara til skúlarnar og til lærararnar.

Hugsanin við hesum uppskoti er, at foreldur at skúlabørnum, og myndugir næmingar fáa størri valfrælsi til at útbúgva børnini. Foreldur at børnum í skúlaaldri (seinri næmingurin sjálvur) fáa eftir hesum uppskoti eina gjaldsváttan frá myndugleikunum við skúlaársbyrjan, sum tey so kunnu lata í skúla, tey velja til síni børn. Hetta gjaldsprógv kann skúlin so innloysa á gjaldstovuni afturfyri fyri reiðan pening at fíggja (frí)skúlans virksemi við. Gjaldsváttanin kann bert í hesum føri galda útbúgving.

Henda uppskotna skipan hevði ført til, at tað verður gjørligt hjá hvørjum (frí)skúla sær at arbeiða meiri innanhýsis við at fáa eitt so gott og dámligt innihald fyri næmingar og foreldur sum gjørligt. Dugnaligar skúlaleiðslur høvdu fingið meir útbúgvingarvirði fyri pengarnar og kundu handlað fríari innanhýsis millum býti av inntøkum sínum.

Verandi almenna eindarskúlaskipan gevur onga vissu fyri bestu gagnnýtslu av almennu

játtanini til rakstur. Allur skúlaskapur verður skorin eftir sama leisti. Seinasta skipið í konvoyini avger ferðina hjá øllum. Mest óskikkaðu pedagogarnir eru lægsti felagsnevnari og dønia næmingarnar til tilsvarandi kunnleikastøði. Góðir lærarar hava sum er ongan rætt til betri lønarúrslit enn vánaligir lærarar. Tað er óræðuvíst móti teim góðu kennarunum og uppalarunum innan skúlagátt. Foreldur og børn noyðast uttan valfrælsi at góðtaka vánaligar skúlar og hava onga aðrastaðni at fara fyri at tryggja børnum sínum betri frálæru.

Verandi skúlaskipan er innrættað og lønarlagið skipað so, at tað eggjar ikki skúlum til nýhugsan. Fingu teir samsýning eftir avrikum, ágrýtni og evnum at læra frá sær, varð meir burturúr hjá teim, ið mest spentu seg út.

Hetta berst best, um skúlin verður innrættaður so, at foreldur fáa eitt fíggjarligt valfrælsi til at senda síni børn til tann skúlan, sum tey halda gevur børnunum mest fyri peningin. Tann rætt hava borgarar sum brúkarar í flest øðrum viðurskiftum og áttu eisini at fingið hann í skúlavalinum til børnini.

Um vit løgdu skúlaverkið undir eitt slag av marknaðarskipan, hevði samfelagið í longdini ikki bert fingið meir fyri tann pris, ið útbúgving kostar, men eisini spart pening umsíðir.

Betri hylling hevði fingist á, hvat skúlaskapur veruliga er verdur í peningi. Verandi 50.000 kr. árliga fyri hvønn næming í miðal ljóðar nevniliga í hægra lagi, sammett við so mangt annað.

Viðvíkjandi skúlahygningum er at siga, at fíggjarkreppan rekur vaksandi tal av barnafamiljum av landinum. Tað verður rúmligari í fleri skúlum, og nakrir verða helst niðurlagdir ella til avlop um stutta tíð. Tað skuldi givið møguleika hjá frískúlum, sum verða stovnaðir eftir hesi lóg, at fingið innivist í egnaðum høllum.

Talan er eisini um sama næmingatal (sum eldur fram at fall, líka til fortreytirnar fyri verandi kreppu eru broyttar við minni skattatrýsti og lægri kostnaðarstøði), so í tann mun, sum foreldur velja sær aðrar skúlar enn teir almennu til børnini, verða almennu skúlarnir tómir til at yvirtaka av frískúlum sum sjálvsigandi stovnum.

Øll okkara grannalond hava skipan um frískúlar og privatar grundskúlar eins og líknandi valfrælsi fyri miðnámsútbúgvingar. So hetta lógaruppskot hevur í grundini sum høvuðsendamál at tryggja minst sama útbúgvingarstøði sum í grannalondum okkara.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í mentannar- og skúlanevndina, sum 21. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1994 beint í skúla- og mentannarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur í hesum sambandi havt fund við landsskúlafyrisitingina. Upplýst varð m.a., at eingin umsókn er komin frá einstaklingum, samkomum, felagsskapum o.ø. um at seta á stovn frískúlar ella privatar skúlar, grundskúlar, framhalds-

deildir ella miðnámsútbúgvingar.

Upplýst varð eisini, at fólkaskúlalógin er sera rúm, og at í § 26 í lógini er frávik soleiðis, at loyvast kann ávist virksemi av ymiskum slag, og kann her undir nevnast, at eitt starv er á fyrisitingini, sum einans fæst við royndar- og menningarvirksemi, og at nakað er selt í gongd á hesum øki.

Tað eru 70 barnaskúlar í landinum, harav umleið helvtin hýsir færri enn 20 næmingum. Um so verður, at játtan verður til enn fleiri skúlar, verður hendan tikin av játtanini til fólkaskúlan, sum so verður enn meiri skerdur. Fólkakskúlin hevur mist 130 størv síðani 1989, og aftur í ár er hann skerdur við eini minni upphædd.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meirilutа og tveir minnitutar.

Meirilutin (Hergeir Nielsen, Jógvan A. Johannessen, Helena Dam á Neystabø) tekur ikki undir við uppskotinum vísandi til hesar viðmerkingar og vísandi til, at fólkaskúlalógin er so rúm, at møguleikar eru fyri rættiliga fjølbroyttum virksemi, sum enn ikki skjøtil er settur á.

Minnilutin (Óli Breckmann) tekur undir við uppskotinum og mælir til at samtykkja tað.

Minnilutin (Terje Davidsen) hevur hesar viðmerkingar: Í Føroyum hava vit ikki tradition fyri friskúlum. Tó er skipanin kend frá nunnuskúlanum og adventistaskúlanum. Nunnuskúlin er nú yvirtikin av Tórshavnar kommunu og fer at verða rikin sum vanligur kommunuskúli.

Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið er endamálið við lógaruppskotinum at geva teimum foreldrum og børnum, sum eru ónøgd við almenna eindarskúlan og sum ynskja at børn teirra skulu fáa serskilda vitan umframt vanliga útbúgving, ein annan valmøguleika. Harafturat verður sagt, at samfelagið skal fáa meir gagnnýtslu burturúr teimum pengum tað almenna skúlaverkið kostar landi og kommunum, og at foreldur og næmingar við hesum friskúlum skulu kunna leggja meir í skúlaskapin enn minstakrøvini hjá landsmyndugleikunum.

Sæð frá einum frísinnaðum sjónarmiði kann tankin um valmøguleikar virka tiltalandi har hann letur seg føra út í lívið.

Føroyski fólkaskúlin leggur dent á at menna felagsskapskensluna og samarbeiði. Børnini mugu saman gjøgnumliva teir sosialu og mentannarligu mótsetningarnar, sum hóast alt eru í samfelagnum.

Vandi er fyri, at ein ov stór privatisering av fólkaskúlanum fer at virka spjaðandi á tey lokalsamfeløgini, sum fáa slíkar friskúlar. Eisini kann roknast við, at hugsjónarligir og aðrir mótsetningar í fólkinum verða óneyðuga skerpaðir.

Fólkaskúlin er í hesum tíðum fyri stórum skerjingum á hvørjum ári, og tað verður tyngri og tyngri at fáa møguleika fyri at geva eina undirvising, sum lýkar tey krøv, sum sett eru frá myndugleikunum. Fráflyting ger eisini, at næmingatalið minkar og skal so harafturat fólkaskúlin missa næmingar til privatar friskúlar, so gerst støðan verri fyri fólkaskúlan. Hetta er til ógagns fyri fólkaskútan ella fólksins skúla.

Fólkaskúlin eigur at hava so nimar ræsir, at hann hevur møguleika at virka sum ein skúli fyri øll í góðum ábyrgdarkendum samstarvi og áliti millum foreldur, skúla og næming. Undirvísingin eigur innan hesar karmar at tillagast støðinum hjá tí einkulta næminginum.

Minnilutin (Terje Davidsen) tekur ikki undir við fyriliggjandi uppskoti og setir eitki uppskot fram.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið fall við 8-0 atkvøðum.

140 Frígeving í úrtíð av kapitaluppsparing til trongstødd

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at leggja fyri tingið lógaruppskot, sum loyvir fíggjarliga illa fyrikomnum uppsparurum av kapitalpensjón at taka pensjónina út við vanligari skattskyldu, uttan at peningastovnar sum kreditorar hava framíhjárætt at leggjast á hesa uppsparing.

Viðmerkingar

Ásannandi, at fleiri og fleiri fólk verða fíggjarliga kroyst millum fallandi inntøku, harðnandi skattatrýst og harav fylgjandi arbeiðsloysi, hevur landsstýrið lagt uppskot fyri tingið um, undir ávísum treytum at frígeva í úrtíð sethúsasamansparing við rentufyrimuni.

Á sama hátt er samtykt, at tvingaða uppsparingin nú í summar verður útgoldin. Eisini hon bjargar árinum fíggjarliga hjá fleiri húskjum (Hon spilti sum kunnugt fíggjarvánirnar hjá teimum og herdi samfelagskreppuna, tá tvingaða samansparingin varð lógarásett og haldløgd í 1989-90).

Men einki røkist fyri, at eigarar av kapitalpensjón í peningastovnunum steppa at taka hetta slag av langtíðar innlánum út, hóast mong halda seg hava meir brúk fyri hesi samansparing nú til at greiða átrokandi fíggjarskyldur enn at goyma peningin til seinni.

Lógin um kapitalpensjón er myndað eftir donsku "rentetorsikringsloven" frá 1958 og sett í gildi í Føroyum í 1971, sama árið sum danska lógin varð sett úr gildi sum ónýttlig í Danmark og har avloyst av "pensionsbeskatningsloven".

Føroyingar liva enn við gomlu donsku lógini, sum bert tilskilar loyvi til at taka hesa kapitaluppsparing úr peningastovnum, tá t.d. spararin noyðist úr starvi vegna sjúku, tá hann flytir av landinum, ella, um spararin er kvinna, verður gift.

Einar 60-70 mió. kr. standa í føroysku peningastovnunum sum kapitalpensjón. Eyðvitað ynskja ikki allir spararar at heva sína kapitalsamansparing, men royna eftir førimuni at varðveita hana til at liva fyri á eldri árum, sum upprunaliga ætlað.

Men mong eru tey, sum nú vilja, men sleppa ikki fyri lógini, at taka kapitalsamansparingina út at liva av saman við t.d. arbeiðsloysisgjaldinum.

Upp til 30.000 kr. árliga av hesum slagi av innláni kundi og kann dragast frá skattskyldugu inntøkuni, tá hetta samansparing varð sett í peningastovn. Tí er rímiligt, at kapitaleftirlønin ber skattskyldu sum vanlig inntøka, um hon verður tikin út nú.

Men tað er eisini umráðandi, at lógaruppskotið verður evnað so til, at peningastovnurin, sum nú hevur líka lítlan rætt at leggjast á hetta slag av samansparing sum eigarin, heldur ikki fær framíhjárætt sum kreditor móti kapitalspararanum, tá hesin av fíggjarligari trongstøðu fær høvi frameftir við nýggjari løgtingslóg at heva pening av kapitalpensjónskonto síni til lívsins uppihald.

1. viðgerð 24. mars 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 26. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 24. mars 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Lasse Klein, Jacob Lindenskov og Heini O. Heinesen) setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot fólkaflokksins.

Minnilutin (Finnbogi Arge) vísir á, at pengastovnar sum kreditorar í verandi støðu ikki kunnu mótrokna í ella leggja hald á netto kapitalpensjónina (aftaná 35% eru farin av í skatti), tá hon verður útgoldin í fyrsta lagi á 60 ára aldri. Tí er orðingin í uppskotinum til samtyktar: "uttan at peningastovnar sum kreditorar hava framíhjárætt at leggjast á hesa uppsparing" óneyðug.

Minnilutin (Finnbogi Arge) vísir eisini á, at núgaldandi lóg heimilar, at kapitalpensjónin í

ávísum førum verður útgoldin áðrenn tíðina. Minnilutin tekur tískil ikki undir við uppskotinum.

2. viðgerð 27. apríl 1994. Uppskotið fall við 8-0 atkvøðum.

141 Broyting í norðurlendskum sáttmála um starvsútinnan hjá ávísum starvsfólkabólkum innan heilsuverkið

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at avtalan frá 28. februar 1990 um broyting av sáttmálanum við Finnland, Ísland, Noreg og Svøriki frá 25. august 1981 um góðkenning av starvsútinnan fyri ávísar starvsfólkabólkar innan heilsuverkið og djóralæknaverkið umframt broyting av ískoytisprotokoll hesum viðvíkjandi verður sett í gildi fyri Føroyar.

Viðmerkingar:

Í 1981 varð sáttmáli gjørdur milluni norðurlond um "godkendelse af erhvervsudøvelse for visse personalegrupper inden for sundhedsvæsenet og veterinærvæsenet".

Sáttmálin er galdandi fyri Føroyar.

Í 1990 gjørdu norðanlond avtalu um broyting í hesum sáttmála, og hevur ríkisumboðið spurt landsstýrið, um landsstýrið hevur nakrar viðmerkingar til, at broytingin verður kunngjørd í Føroyum.

Broytingin snýr seg um viðurskiftini hjá optikarum í norðanlandi, sum útinna starv í øðrum norðanlandi. Víst verður annars til "resumé" frá uttanríkismálaráðnum um broytingarnar og avtaluna hesum viðvíkjandi umframt upprunaliga sáttmálan.

1. viðgerð 21. mars 1994. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð beint í rættarnevndina.

Ein samd rættarnevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 15. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

FL jnr. 1360-1/90.

142 Broytingar í revsilógini

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtinglð samtykkir, at fylgjandi broytingar í revsilógini verða settar í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan:

1) **§ 1, nr. 1-3, í lóg nr. 248 frá 9. juni 1967 ("forældelse, pornografi, homoseksualitet, prostitution m.v.").**

2) **Lóg nr. 550 frá 22. desember 1971 ("skattesvig og indsmugling"), tó við fylgjandi broytingum:**
a) Í § 1, nr. 1, verður sett, at § 93, stk.3, verður orðað soljóðandi:
"Stk. 3. For overtrædelse af denne lovs § 289, 1. pkt., eller § 139 i den færøske lagtingslov om landsskat og kommuneskat er forældelsen i intet tilfælde mindre end 10 år."

b) Í § 1, nr. 3, verður aftaná § 288 sett:
"§ 289. Med fængsel indtil 4 år straffes den, der gør sig skyldig i skattesvig af særlig grov karakter, jfr. den færøske lagtingslov om landsskat og kommuneskat § 139. På samme måde straffes den, der gør sig skyldig i indsmugling af særlig grov karakter, jfr. den færøske lagtingslov om told § 31, stk. 2, smh. med stk. 1, eller den, der gør sig skyldig i en tilsvarende overtrædelse af § 31, stk.3."

3) § 1 í lóg nr. 396 frá 13. juni 1990 ("forenkling og modernisering inden for Justitsministeriets område").

4) § 1, nr. 1-3, í lóg nr. 6 frá 3. januar 1992 ("Samfundstjeneste m.v.").

5) Lóg nr. 282 frá 29. apríl 1992 ("Beskyttelse af vidner m.v.").

6) § 2 í lóg nr. 385 frá 20. mai 1992 ("Anklagemyndighedens struktur").

Viðmerkingar:

Ríkisumboðið hevur í skrivi dagfest 27. mai 1993 spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at nevndu lógir um broytingar í revsilógini verða settar í gildi í Føroyum.

Lógirnar kunnu setast í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipanum við neyðugum broytingum vegna serligu føroysku viðurskiftini.

Landfútin hevur havt lógarbroytingarnar til kanningar og hevur mælt til, at tær verða settar í gildi fyri Føroyar.

Viðmerkingar til tær einstøku lógarbroytingarnar:

Ad. 1) Lóg nr. 248 frá 9. juni 1967:
Eftir lógini verða reglurnar í revsilógini (§§ 93-97c) um fyrning endurskoðaðar og í § 93 eru fyrningarfreistirnar ásettar í mun til revsirammurnar fyri tey einstøku brotsverkini.

Ad. 2) Lóg nr. 550 frá 22. december 1971:
Lógin var upprunaliga ikki galdandi fyri Føroyar, men við lóg nr. 272 frá 3. mai 1989, § 2. nr. 3, varð lógin broytt soleiðis, at hon kann setast í gildi fyri Føroyar við kgl. fyriskipan við neyðugum broytingum vegna serlig føroysk viðurskifti.

Eftir lógini verður ásett fongsulsrevsing upp til 4 ár fyri grovt skattasvik og grovt brot á tollløggávuna.

Straffirammurnar í skattalógini og tollløgini eru 2 ár.

Grundin fyri at tær høgu revsirammurnar fyri brot á skattalóggávuna og tolllóggávuna verða settar í kap. 28 í sjálvari revsilógini er, at áherðsla eigur at leggjast á, at hesi lógarbrot í ávísum førum mugu metast javnt við onnur lógarbrot eftir kap. 28 í revsilógini um ríkingarbrotsverk (økonomisk kriminalitet).

Lógin kann setast í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan við neyðugum broytingum vegna serligu føroysku viðurskiftini.

Eftir uppskotinum verður lógin sett í gildi við teimum broytingum, at víst verður til løgtingslógirnar um skatt og toll í staðin fyri til tilsvarandi donsku lógirnar. Skotið verður eisini upp, at fyrningin fyri brot á § 289 í revsilógini og § 139 í løgtingslógini um landsskatt og kommunuskatt verður fyrningarfreistin í ongum føri styttri enn 10 ár. Fyrningarfreistin fyri brot á tolllóggávuna verður framvegis 5 ár.

Ad. 3) Lóg nr. 396 frá 13. juni 1990:
Lógarbroytingin viðvíkur reglunum um skiftisstraff (afsoning) fyri bøtur, ið eru samtyktar eftir tilboði frá løgregluni og fyri bøtur ið ein ákærdur hevur samtykt í rættinum ella sum rætturin hevur álagt.

Lógin kann setast í gildi í Føroyum uttan broytingar.

Ad. 4) Lóg nr. 6 frá 3. januar 1992:
Heldur rætturin treytaðan dóm ikki vera nóg mikil revsing, kann rætturin eftir lógarbroytingini lata dómin verða treytaðan av, at persónurin átekur sær eina samfelagstænastu undir eftirliti. Arbeiðið skal vera ólønt og vara í minsta lagi 40 tímar og í mesta lagi 240 tímar.

Ad. 5) Lóg nr. 282 frá 29. apríl 1992:
Eftir broytingarlógini verður harðskapur, tvingsil, hóttanir ella onnur revsiverd tiltøk móti vitnum revsað við hefti ella fongsli upp til 6 ár.

Harðskapur o.tl. móti vitnum verður eftir galdandi lóg í Føroyum revsað eftir vanligu reglunum um harðskap móti persónum.

Ad. 6) Lóg nr. 385 frá 20. mai 1992:
Eftir lógaruppskotinum verða heimildir hjá statsadvokatinum og løgmálaráðnum í ávísum ákærumálum lagdar undir vanliga ákærumyndugleikan.

1. viðgerð 21. mars 1994. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 21. mars 1994 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og tekur **ein samd nevnd** undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 15. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

FL jnr. 514-1/91.

143 Ígildissetan fyri Føroyar av "Nordisk Konvention om Social Sikring"

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir, at "Nordisk Konvention om Social Sikring" frá 15. juni 1992 verður sett í gildi fyri Føroyar.

Viðmerkingar

Við hesum uppskoti mælir landsstýrið løgtinginum til at taka undir við, at "Nordisk Konvention om Social Sikring" verður sett í gildi fyri Føroyar.

Føroyar eru partur av tí norðurlendska samstarvinum. Hetta er eina mest grundað á eitt ynski frá føroyskari síðu um at styrkja samstarvið millum Føroyar og hini norðurlondini. Ein fylgja av hesum samstarvinum var m.a., at "Nordisk Konvention om Social Tryghed" frá 1982 eisini var sett í gildi fyri Føroyar.

Politiska støðan í Europu er, at fleiri lond hava ynskt eitt tættari tilknýti til Europeiska Felagsskapin (EF). Ein avleiðing av hesum er, at tað er gjørdur ein Europeiskur Økonomiskur Samstarvssáttmáli (EØS-sátmálin) millum EF-londini og tey londini, sum eru við í Europeiska Fríhandilssamstarvinum (EFTA-londini). Í hesum sambandi hevur tað verið neyðugt at gera nakrar broytingar í "Nordisk Konvention om Social Tryghed", við tað at tað norðurlendska samstarvið nú má hava støðið í EF-reglunum.

EF-reglurnar fevna tó einans um arbeiðstakarar, sjálvstøðug og familjur teirra. Fyri at víðka um bólkin av teimum tryggjaðu til eisini at fevna um t.d. lesandi, brekaði og aðrar bólkar, sum ikki hava tilknýti til arbeiðsmarknaðin, er tað neyðugt við serstøkum norðurlendskum reglum, sum fevna um fleiri persónar enn teir, sum EØS-sátmálin fevnir um.

Í staðin fyri ta higartil galdandi konventiónina frá 1982 er ætlanin at tað skulu koma 2 nýggjar norðurlendskar konventiónir:

1) "Konvention om Social Sikring", og
2) "Konvention om Social Bistand og Sociale Tjenester".

Fyrra konventiónin verður við hesum uppskoti løgd fyri løgtingið, meðan hin konventiónin fer at verða løgd fyri løgtingið seinni.

Her skal einans í stórum dráttum verða greitt frá høvuðstættunum í EF-reglunum, umframt hvørjar fíggjarligar og fyrisitingarligar avleiðingar tað fer at táa, at konventiónin fær gildi fyri Føroyar. Víst verður til hjáløgdu frágreiðing um nevvari upplýsingar.

EF-reglurnar hava støði í 4 grundreglum, sum verða nýttar í sambandi við viðger av øllum teimum veitingum, sum reglurnar fevna um. Hesar EF-grundreglur verða nú eisini galdandi í øllum EØS-økinum og sostatt eisini í norðurlondunum:

1) javnstøðugrundreglan, (ligebehandlingsprincip)
2) uppvinningargrundreglan, (optjeningsprincip),
3) samanleggingargrundreglan, (sammentægningsprincip)
4) útflutningsgrundreglan, (eksportprincip).

Javnstøðugrundreglan hevur verið nýtt higartil, meðan hinar 3 grundreglurnar stórt sæð ikki hava verið galdandi.

Teir **persónarnir, sum verða tryggjaðir við konventiónini**, eru allir norðurlendskir statsborgarar, flóttafólk og statsleys, sum hava flóttafólkastøðu í norðurlondunum, umframt aðrir ávísir persónar, sum undir serligum umstøðum, t.d. við hjúnalagi, hava fingið rættindi sambært norðurlendskari lóggávu.

Tær sosialu **veitingarnar, sum konventiónin fevnir um**, eru:

1) Veitingar vegna sjúku, føðing ella ættleiðing,
2) veitingar vegna avlamni, aldurdómi ella deyða,
3) veitingar vegna arbeiðsskaða,
4) veitingar vegna arbeiðsloysi,
5) almennar kontantveitingar til børn.

Í hesum sambandi skal viðmerkjast, at áskoðan landsstýrisins er, at konventiónin eigur at fáa gildi fyri Føroyar. Iletta fyri at tryggja, at føroyingar, sum antin í frítíðarørindum ella av øðrum grundum uppihalda sær í stytri ella longri tíð í einum av hinum norðurlondunum, verða javnsettir við aðrar norðurlendskar borgarar.

Fær konventiónin ikki gildi fyri Føroyar, verða føroyingar forðaðir í á jøvnum føti við aðrar norðurlendskar borgarar at fáa sjúkrahjálp, aldurspensión, barnagjald, arbeiðsskaðaveitingar o.s.fr.

Fíggjarligu avleiðingarnar av, at konventiónin fær gildi í Føroyum eru fylgjandi:

Fyri allar veitingar uttan pensiónir, er tann meginregla galdandi, at ongin endurrindan fer fram millum norðurlondini fyri veitingar, sum verða rindaðar vísandi til javnstøðugrundregluna, um annað ikki er ásett. Hendan meginreglan hevur eisini higartil verið galdandi og førir sostatt onga broyting við sær í mun til galdandi konventión.

Viðvikjandi pensiónum skal áherðsla leggjast á, at allir norðurlendskir statsborgarar, sum hava uppihildið sær meira enn 3 ár í Føroyum, koma at hava krav uppá ein pensiónspart frá Føroyum. Góðkennir løgtingið konventiónina, verður tað tí neyðugt at broyta játtanar- og útrokningarreglurnar í føroysku pensiónslóggávuni, soleiðis at heimild fæst fyri at játta partpensión til norðurlendskar statsborgarar, sum búgva í EØS-londum, tá pensiónstilfeldurin herst á.

Á sama hátt skal pensiónin hjá norðurlendskum statsborgrum, ið sum pensiónistar uppihalda sær í Føroyum, setast saman við partpensiónum frá teimum londum, har teir hava uppihildið sær, áðrenn teir komu til Føroyar, og Føroyar koma tí ikki sum nú at hava skyldu til at gjalda teimum fulla pensión.

Eisini kann upplýsast, at ætlanin er at gera eina avtalu við Almannamálaráðið í Danmark um eina serliga skipan fyri teir donsku statsborgararnar, sum einans hava uppvunnið sær sín pensiónsrætt innan fyri ríkisfelagsskapin (Danmark, Føroyum, Grønlandi). Ætlanin er, at tað fyri hesar persónar skal vera galdandi, at teir fáa alla sína pensión rindaða í tí landinum, sum teir í løtuni uppihalda sær í, og samsvarandi teimum reglum, sum eru galdandi í hesum landinum.

Staðfestast kann tí, at Føroyar við at góðkenna konventiónina ikki áteka sær pensiónsskyldur yvirfyri statsborgarum í øðrum EØS-londum enn tey norðurlendsku - líkamikið hvussu leingi teir uppihalda sær í Føroyum. Hendan skyldan áliggur danska statinum einsamøllum.

Eisini er ætlanin, at umsitingin viðvikjandi útflutningunum av pensiónspørtum, øll skal fara fram gjøgnum Almannamálaráðið í Danmark. Føroysku myndugleikarnir (Almannastovan) skulu tó viðgera einkultmálini og rokna út pensiónspartin, sum er uppvunnin í Føroyum. Hetta verður síðani fráboðað Almannamálaráðnum, sum síðani samskipar og avgreiðir pensióniua víðari.

Samanumtikið kann í stuttum sigast, at konventiónin kemur at virka sum ein yvirbygningur á EF-reglurnar, soleiðis at rættarstøðan hjá borgarunum í teimum norðurlendsku londunum kemur at vera óbroytt í mun til higartil galdandi reglur.

Almannastovan hevur mælt til, at konventiónin verður sett í gildi í Føroyum. Eisini hevur Almannastovan boðað landsstýrinum frá, at stovnurin er førur fyri at umsita nýggju pensiónsskipanina.

At enda kann upplýsast, at konventiónin er galdandi fyri Danmark og Grønland.

1. viðgerð 21. mars 1994. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 6. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 21. mars 1994 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og havt fund við Johnny Winther Holbech, deildarstjóra í landsstýrinum og Nellu Festirstein, fulltrúa. Greitt varð nærri frá viðmerkingunum og varð víst á frá embætisfólkunum, at neyðugt verður at broyta pensiónslóggávuna, verður fyriliggjandi uppskot samtykt. Nevndin tekur undir við uppskoti landsstýrisins og roknar við at landsstýrið ger upppskotini til neyðugu broytingarnar.

2. viðgerð 12. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

FL jnr. 1042-4/91.

144 Løgtingslóg um ættleiðingarstuðul

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði løgmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

<u>løgtingslóg um ættleiðingarstuðul</u>.

§ 1. Foreldrum, ið ættleiða eitt útlendskt barn, verður veittur ein ættleiðingarstuðul uppá 15.000 kr. til útreiðslur í samband við ættleiðingina.
Stk. 2. Útlendsk børn eftir hesi lóg eru børn, sum ikki eru statsborgarar í Danmark, Finlandi, Íslandi, Noregi ella Svøriki.

§ 2. Ættleiðingarstuðul verður veittur einaferð fyri hvørt ættleitt barn.

§ 3. Ættleiðingarstuðul kann einans verða veittur foreldrum, ið hava fastan bústað í

<u>lagtingslov om adoptionstilskud</u>.

§ 1. Til forældre, som adopterer et udenlandsk barn, ydes der et adoptionstilskud på kr. 15.000,- til udgifter i forbindelse med adoptionen.
Stk. 2. Udenlandske børn i denne lov er børn, der ikke er statsborgere i Danmark, Finland, Island, Norge eller Sverige.

§ 2. Adoptionstilskud ydes som et engangsbeløb for hvert adopteret barn.

§ 3. Adoptionstilskud kan kun ydes forældre, der har fast bopæl på Færøerne.

Føroyum. Stuðulin verður veittur uttan mun til inntøku foreldranna.

§ 4. Treytin fyri at fáa ættleiðingarstuðul er, at barnið er fingið gjøgnum ein av teimum felagsskapum, sum eru góðkendur av løgmálaráðnum í Danmark sambært § 3 í "Adoptionsbekendtgørelse for Færøerne" (nr. 553 frá 8. oktober 1982).
Stk. 2. Góðkendir felagsskapir eru:
1) Adoption center,
2) Danadopt og
3) Terre des Hommes, Danmark.

§ 5. Umsókn um ættleiðingarstuðul skal sendast Almanna- og heilsudeild landsstýrisins.
Stk. 2. Stuðulin verður rindaður, tá ríkisumboðið sum ættleiðingarkannandi myndugleiki hevur sent landsstýrinum váttan um, at barnið er komið til Føroyar.

§ 6. Avgerðir landsstýrisins sambært hesi lóg kunnu innan 4 vikur kærast til Kærunevndina í Almannamálum.

§ 7. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. Foreldur, ið hava ættleitt eitt útlendskt barn, sum er komið til Føroya aftaná 1. januar 1994, hava rætt til stuðul sambært hesi lóg.

Tilskudet ydes uden hensynstagen til forældrenes indkomst.

§ 4. Betingelsen for at få adoptionstilskud er, at barnet er formidlet af en af de organisationer, der er godkendt av justitsministeriet i Danmark jvf. § 3 i Adoptionsbekendtgørelse for Færøerne (nr. 553 af 8. oktober 1982).
Stk. 2. Godkendte organisationer er:
1) Adoption center.
2) Danadopt og
3) Terre des Hommes, Danmark.

§ 5. Ansøgning om adoptionstilskud skal indgives til Landsstyrets Social- og Sundhedsafdeling.
Stk. 2. Tilskudet udbetales, når Rigsombudet som den adoptionsundersøgende myndighed over for Landsstyret har attesteret, at barnet er kommet til Færøerne.

§ 6. Landsstyrets afgørelser efter denne lov kan inden 4 uger påklages til Det sociale Ankenævn.

§ 7. Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.
Stk. 2. Forældre, der har adopteret et udenlandsk barn, som er kommet til Færøerne efter 1. januar 1994, er berettiget til tilskud efter denne lov.

Viðmerkingar:
Í viðmerkingunum til fíggjartógaruppskotið fyri 1994 framgongur, at ætlanin er, at ein partur av játtanini til § 19. 19904-373305: "Landsstýrinum at ráða yvir" skal nýtast til at játta stuðul uppá kr. 15.000,- til foreldur, ið ættleiða útlendsk børn.

Við hesum uppskoti til løgtingslóg verða reglurnar fyri hesum stuðlinum ásettar; t.d. hvør hevur rætt til stuðul, hvussu nógv, hvar umsókn skal sendast og treytirnar annars fyri rindan av stuðlinum.

Eins og í hinum norðurlondunum verður eftir hesum reglum ikki latin ættleiðingarstuðul í samband við ættleiðing innan familjuna og av stjúkbørnum. Heldur ikki verður stuðul latin til at ættleiða barn úr hinum norðurlondunum.

Hetta er grundað á, at hesar ættleiðingar verða viðgjørdar og avgreiddar av einum av

myndugleikunum, sum eru partar av alnennu umsitingini í norðanlondunum. Tað eru tí ikki tær somu útreiðslurnar tengdar at hesum ættleiðingunum, sum tá talan er um ættleiðing av útlendskum børnum.

Viðvíkjandi ættleiðing av útlendskum børnum, hevur løgmálaráðið góðkent serligar hjálparfelagsskapir, ið standa fyri og taka sær av sambandinum við tey útlond, sum hava børn, ið kunnu ættleiðast. Hesir felagsskapir hava nógvar útreiðslur í samskiftinum við útlondini um ættleiðing, og tí er teimum loyvt at taka gjøld, sum skulu vera við til at liggja hetta arbeiði.

Ríkisumboðið er ættleiðingarmyndugleikin í Føroyum, og í samband við hetta lógaruppskotið hevur landsstýrið fingið nærri upplýsingar viðvíkjandi ættleiðingum frá Ríkisumboðnum.

Útreiðslurnar í samhandi við ættleiðing av útlendskum børnum.

Hesar kunnu býtast í 3 bólkar:

1) <u>Upptøku/fyrisitingargjald</u>: kr. 10.000,-
Hetta gjaldið skulu øll, ið søkja um ættleiðing rinda, tá umsóknin verður latin inn.

2) <u>Heimtøku/millumgongugjald</u>: kr. 30.000 - 43.000,-
Støddin á hesum gjaldinum er ymiskt, alt eftir úr hvørjum landi foreldrini ynskja at ættleiða eitt barn. Gjaldið verður goldið, tá foreldrini hava góðtikið at ættleiða eitt barn, sum av ættleiðingarmyndugleikunum er tilboðið teimum.
Gjaldið fevnir um tær útreiðslur, ið standast av at fáa pappír og umstøðurnar hjá barninum í rættlag, umframt aðrar útreiðslur, sum hjálparfelagsskapurin hevur í sambandi við at útvega og varðveita møguleikarnar fyri at fáa í lag ættleiðingar frá teimum ymisku londunum.
Eisini fevnir gjaldið um ein part av teimum útreiðslum, sum hjálparfelagskapirnir hava til hjálpararbeiði fyri børnum í ymiskum londum. Hetta hjálpararbeiðið er ein partur av ættleiðingararbeiðnum, og í fleiri gevaralondum er hetta arbeiðið eisini ein fyritreyt fyri at fáa loyvi at ættleiða børn úr teirra londum.

3A) <u>Útreiðslur við at fylgja barninum frá gevaralandinum til Kastrup (kr. 6.000,-) og ferða- og uppihaldsútreiðslur foreldranna at fara til Danmarkar eftir barninum</u>.
Hetta gjaldið skal gjaldast, tá tað er hjálparfelagskapurin, sum skipar fyri, at barnið kemur til Danmarkar. Foreldrini skulu tá avheinta barnið í Kastrup.

ella

3B) <u>Ferða- og uppihaldútreiðslur foreldranna í gevaralandinum, meðan ættleiðingarmálið verður viðgjørt</u>.
Um foreldrini sjálvi skulu til útlandið í stytri ella longri tíð fyri at taka lut í einum parti av viðgerðini av ættleiðingarmálinum, og tí tey skulu taka barnið heim við sær, eru tað foreldrini sjálvi, sum rinda allar ferða- og uppihaldsútreiðslurnar, ið standast av hesum.

Í upplýsingum frá Ríkisumboðnum framgongur eisini, at flestu gevaralondini krevja, at foreldrini eru í gevaralandinum, meðan ættleiðingarmálið verður viðgjørt av myndugleikunum har.

Eisini verður upplýst, at tey flestu børnini, sum verða ættleidd til Føroyar, koma frá teimum londum, sum sela hesa treyt.
Hetta hevur við sær, at føroysk foreldur, ið ættleiða útlendsk børn, vanliga hava útreiðslur uppá meira enn kr. 100.000,- í sambandi við ættleiðingina.

Talið av ættleiðingum í Føroyum.
Talið av góðkenning til ættleiðing sýnir rákið á ættleiðingar-økinum. Sambært Ríkisumboðnum so ganga tað ofta fleiri ár, frá tí at foreldrini hava fingið góðkenning til ættleiðing, men áðrenn ættleiðingarloyvið kann útskrivast.

Tølini fyri 1990 - 1993 eru fylgjandi:

	1990	1991	1992	1993
Góðkenningar:	9	13	1	3
Ættleiðingarloyvi:	6	15	8	14

Eisini verður upplýst, at falt 5 foreldur í løtuni bíða eftir at táa tilboðið eitt barn, ella sum bíða eftir at sleppa eftir einum barni, sum tey hava játtað at vilja hava.

At enda kann upplýsast, at í Danmark er ættleiðingarstuðulin pr. 1. januar 1994 kr. 31.332,-

1. viðgerð 21. mars 1994. Málið varð heint í almanna- og heilsunevndina, sum 6. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 21. mars 1994 heint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og havt fund við Anne Dannertjord, fulltrúa á Ríkisumboðsskrivstovuni, ið kunnaði nevndina um hesi ættleiðingarviðurskiftini. Ríkisumboðið er ættleiðingarmyndugleikin í Føroyum.

Ættleiðingarstuðulin eftir uppskoti landsstýrisins er settur til kr. 15.000,-, meðan danski stuðulin nýliga er hækkaður upp í kr. 30.000,-. Higartil hevur eingin stuðul verið latin í føroyskari lóggávu. Á fíggjarlógini í ár verður møguligur stuðul tikin av § 19, 19904-373305: Landsstýrinum at ráða yvir.

Nevndin tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 12. apríl 1994. Samtykt við 27-0 atkvøðum at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 15. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

FL jnr. 1018-3/92.

Lóg nr. 51 frá 3. mai 1994.

145 Løgtingslóg um dagpening vegna ættleiðing

Ár 1994, friggjadagin 18. mars legði løgmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um dagpening vegna ættleiðing.

§ 1. Foreldur, ið ættleiða barn, hava rætt til dagpening eftir reglunum í hesi løgtingslóg.

§ 2. Treytin fyri at fáa dagpening eftir hesi løgtingslóg er, at teir myndugleikar, sum kanna ættleiðingarmøguleikarnar, hava tikið ta avgerð, at annað av foreldrunum skal vera heima í samband við móttøkuna av barninum.

§ 3. Dagpeningur verður veittur samsvarandi reglunum í kapittul 6 í "Lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom og fødsel", soleiðis at móttøkudagurin verður at javnmeta við føðing, og at kvinna, ið ættleiðir, verður at javnmeta við kvinnu, ið hevur átt.

lagtingslov om dagpenge ved adoption.

§ 1. Forældre, som adopterer et barn, er berettiget til dagpenge efter reglerne i denne lagtingslov.

§ 2. Retten til dagpenge efter denne lagtingslov er betinget af, at de adoptionsundersøgende myndigheder har truffet afgørelse om, at en af forældrene skal være hjemme i forbindelse men modtagelsen af barnet.

§ 3. Dagpenge ydes i henhold til reglerne i kapitel 6 i "Lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom og fødsel", således at modtagelsesdagen sidestilles med fødsel, og en kvinde, der adopterer, sidestilles med en kvinde, der har født.

Stk. 2. Betingelser og regler i øvrigt for

Stk. 2. Treytir og reglur annars fyri dagpeningi sambært "Lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom og fødsel" eru eisini galdandi fyri dagpening við ættleiðing.

§ 4. Umsókn um dagpening vegna ættleiðing skal sendast Almannastovuni innan 6 mánaðir aftaná móttøkuna av barninum. Verður umsókn ikki send innan hesa freistina, fellur rætturin til dagpening burtur.

§ 5. Avgerðir Almannastovunnar sambært hesi lóg kunnu innan 4 vikur kærast til Kærunevndina í almannamálum.

§ 6. Hendan lóg hevur gildi frá 1. januar 1994.
Stk. 2. Foreldur, ið við atliti at ættleiðing hava tikið eitt barn heim áðrenn 1. januar 1994, men sum framvegis eru í farloyvi, hava rætt til dagpening sambært hesi lóg frá 1. januar 1994 og til farloyvi er liðugt.

retten til dagpenge efter "Lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom og fødsel" er også gældende for dagpenge ved adoption.

§ 4. Anmodning om dagpenge ved adoption skal indgives til Almannastovan inden 6 måneder efter modtagelsen af barnet. Hvis anmodning ikke er indgivet inden denne frist, bortfalder retten til dagpenge.

§ 5. Almannastovans afgørelser efter denne lov kan inden 4 uger påklages til Det sociale Ankenævn.

§ 6. Denne lov har virkning fra 1. januar 1994.
Stk. 2. Forældre, som med henblik på adoption har hjemtaget et barn inden 1. januar 1994, og som fortsat er i orlov, er berettiget til dagpenge efter denne lov for perioden fra 1. januar 1994 og til orlovens afslutning.

Viðmerkingar:

Løgtingslóg nr. 189 frá 28. desember 1992 um avtøku av løgtingslóg um dagpening í sambandi við barnsburð og sjúku fekk gildi 1. januar 1993.

Við avtøkuni av hesi lógini, fall eisini rætturin til dagpening hjá foreldrum, ið ættleiða børn, burtur. Hesi foreldur koma ikki undir reglurnar um dagpening í "Lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom og fødsel", og tí hava foreldur, ið ættleiða børn, ikki havt rætt til dagpening í samband við ættleiðing síðani 1. januar 1993.

Hetta er óheppið, av tí at tað ikki er nakað, ið talar fyri, at munur skal verða gjørdur viðvíkjandi rættinum til dagpengar hjá teimum foreldrum, ið sjálvi kunnu fáa síni børn, og so teimum, sum er noydd til at ættleiða børn síni.

Við hesum uppskotinum til løgtingslóg fáa tey foreldur, sum ættleiða børn síni, sama rætt til dagpening sum onnur foreldur.
Tvs. at dagpeningur kann veitast kvinnuni í 24 vikur, aftaná at foreldrini hava fingið barnið. Treytirnar annars í "Lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom og fødsel" skulu tó vera til staðar, so sum: bústað í Føroyum, ávísa arbeiðsinntøku ávísa tíð innan ættleiðingina, útrokningin av dagpeningi o.s.fr.

Fíggjartigu avleiðingarnar.
Talið av góðkenning til ættleiðing sýnir rákið á ættleiðingar-økinum. Sambært Ríkisumboðnum ganga tað ofta fleiri ár, frá tí at foreldrini hava fingið góðkenning til ættleiðing, men

áðrenn ættleiðingarloyvið kann útskrivast.

Tølini fyri 1990 - 1993 eru fylgjandi:

	1990	1991	1992	1993
Góðkenningar:	9	13	1	3
Ættleiðingarloyvi:	6	15	8	14

Eftir hesum sæst, at talið av góðkenningum er fallið munandi 2 tey seinastu árini. Hetta vil um nøkur ár vísa seg við, at tað fara at koma færri ættleidd børn til Føroyar.

Ríkisumboðið hevur upplýst, at í løtuni bíða tilsamans 5 foreldur eftir at fáa boðið eitt barn, ella sum bíða eftir at sleppa eftir einum barni, sum tey hava játtað at vilja hava.

Almannastovan hevur upplýst, at hægsta útreiðslan, ið kann standast av, at ein kvinna fær fulla dagpeningaupphædd vegna ættleiðing í 24 vikur er: kr. 2.676 x 24 vikur = kr. 64.224.

Uppskotið hevur sostatt nakrar meirútreiðslur við sær, men talan er um smáar upphæddir í mun til samlaðu dagpeningaútgjaldingarnar. Útreiðslurnar í 1994 mugu tí metast at kunna verða hildnar innanfyri játtanina til dagpeningaskipanina í 1994.

Viðmerkjast skal tó, at tær kvinnur, ið sambært sáttmála hava rætt til løn í samband við fráveru úr arbeiði vegna ættleiðing, ikki hava rætt til dagpening frá Almannastovuni. Einans tær kvinnur, ið eru tímalønttar ella sum hava teknað eina sjálvboðna dagpeningatrygging sambært dagpeningalógini hava rætt til dagpening.

1. viðgerð 21. mars 1994. Málið varð beint í almanna- og heilsudeildina, sum 27. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 21. mars 1994 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi og hevur eisini havt fund við Nellu Festirstein, landsstýrisfulltrúa.

Nevndin tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men mælir til at § 3 í uppskoti landsstýrisins verður broytt. Ístaðin orðaljóðið "kvinna", ið ættleiðir verður sett "maður ella kvinna".

Víst verður á, at neyðugt er at gera samsvarandi broytingar í ordingini av dagpeningalógini í ávísum førum, soleiðis at samsvar verður millum ásetingarnar í hesi lóg og javnstøðulógini.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins við nevndu broyting og setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 3. stk. 1. verður sett aftaná setningin "og at.": "maður ella".

I § 3, stk. 1, indsættes efter ordene "sidestilles med": "en mand eller".

2. viðgerð 28. apríl 1994. Broytingaruppskot meirilutans samtykt við 26-0 atkvøðum. Uppskotið soleiðis broytt samtykt við 26-0 atkvøðum.

3. viðgerð 28. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

FL jnr. 1018-3/92.

Lóg nr. 77 frá 17. mai 1994.

146 Ígildissetan fyri Føroyar av "Bekendtgørelse af aftale af 9. december 1988 med Finland, Island, Norge og Sverige om den retlige stilling for fællesnordiske institutioner og deres ansatte"

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði løgmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at setast kann í gildi fyri Føroyar "Bekendtgørelse af aftale af 9. december 1988 med Finland, Island, Norge og Sverige om den retlige stilling for fællesnordiske institutioner og deres ansatte".

Viðmerkingar

Ríkisumboðið hevur í skrivi dagfest 21. januar 1993 biðið landsstýrið góðkenna, at "Bekendtgørelse af aftale af 9. december 1988 med Finland, Island, Norge og Sverige om den retlige stilling for fællesnordiske institutioner og deres ansatte" verður sett í gildi í Føroyum.

Avtalan ásetur reglur fyri felagsnorrønar stovnar, sum eru stovnsettir og goldnir av norðurlendska ráðharraráðnum. Hesir stovnar verða sambært avtaluni roknaðir sum sjálvstøðugir juridiskir persónar í tí landinum teir eru í.

Hetta merkir, at stovnurin t.d. kann keypa ella selja fasta ogn og vera partur í einum rættarmáli. Stovnurin kann seta fólk í starv, sum eru borgarar í norðanlondum. Stovnurin kann við loyvi ráðharraráðsins eisini seta fólk úr øðrum londum í starv. Miðað eigur at verða ímóti, at býtið av leiðarastørvum verður rímiliga býtt millum borgarar úr norðanlondum.

Ráðharraráðið ger arbeiðsreglur og reglur fyri setanar- og lønarviðurskifti hjá fólki á hesum stovnum. Lønaraldur vunnin á hesum stovnum telur við í lønaraldrinum, um viðkomandi verður settur í starv í heimlandinum. Fólk, sum eru almennt sett, og sum verða sett í tíðaravmarkað starv á norðurlendskum stovni, fáa farloyvi úr starvi sínum, meðan tey røkja tíðaravmarkaða starvið.

Avtalan er - sum sæst - frá 1988, og hevur hon, hóast hon ikki er í gildi í Føroyum, verið nýtt vegleiðandi. Hon fer at verða gaidandi fyri norðurlandahúsið, um hon verður sett í gildi.

1. viðgerð 21. mars 1994. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 21. mars 1994 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og **ein samd nevnd** mælir løgtinginum til at taka undir við málinum. Í einum ískoytisskjali nevnd "Resume" stendur, at "Der skal søges en rimelig fordeling af de ledende stillinger mellem borgere fra de forskellige nordiske lande", tá ið felagsnorðurlendskir stovnar seta fólk í starv. Rættarnevndin mælir landsstýrinum til at kanna, um Føroyar og føroyingar eru fevndir av hesi ætlan.

2. viðgerð 21. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

FL jnr. 30-6/93.

147 Ígildissetan fyri Føroyar av "Bekendtgørelsee af overenskomst af 18. december 1973 med Finland, Norge og Sverige om samordning af pensionsrettigheder ifølge statslige pensionsordninger" og "Bekendtgørelse af protokol af 28. juni 1990 med Finland, Norge og Sverige om ændring af nordisk pensionsoverenskomst af 18. december 1973"

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði løgmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at setast kann í gildi fyri Føroyar "Bekendtgørelse af overenskomst af 18. december 1973 med Finland, Norge og Sverige om samordning af pensionsrettigheder ifølge statslige pensionsordninger" og "Bekendtgørelse af protokol af 28. juni 1990 med Finland, Norge og Sverige om ændring af nordisk pensionsoverenskomst af 18. december 1973".

Viðmerkingar

Ríkisumboðið hevur í skrivi dagfest 1. apríl 1993 biðið landsstýrið góðkenna, at "Bekendtgørelse af overenskomst af 18. december 1973 med Finland, Norge og Sverige om samordning af pensionsrettigheder ifølge statslige pensionsordninger" og "bekendtgørelse af protokol af 28. juni 1990 med Finland, Norge og Sverige om ændring af nordisk pensionsoverenskomst af 18. december 1973" verða settar í gildi í Føroyum.

Endamálið við avtaluni er at tryggja, at eftirlønarskipan í heimlandinum ikki forðar fyri, at fólk fara í starv í einum øðrum norðanlandi.

Sáttmálin fevnir um eftirlønarrættindi úr størvum, sum hava eina statsliga eftirlønarskipan, t.d. tænastumenn. Um starvsfólkið fer í starv í øðrum norðanlandi, fær viðkomandi lønar- og eftirlønaraldur við sær.

Annars verður vist til resumé, sum danska uttanríkisráðið hevur gjørt hesum viðvíkjandi.

Mælt verður til at seta avtaluna í gildi í Føroyum.

1. viðgerð 21. mars 1994. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 6. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 21. mars 1994 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og havt fund við Súsonnu Danielsen, leiðara av lønardeildini í Tinganesi.

Upplýst varð, at tað er torført at meta um, hvørjar fíggjarligu avleiðingarnar av fyriliggjandi máli verða sum frá líður. Hesum eigur landsstýrið at hava eyguni eftir.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 12. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 20-0 atkvøðum.

FL jnr. 1042-7/93.

148 Ígildissetan fyri Føroyar av broytingum í lóg um radiosamskifti

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði løgmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at seta í gildi fyri Føroyar "Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om radiokommunikation".

Viðmerkingar

Radiosamskifti er felagsmál eftir heimastýrislógini, og er danska lógin frá 1969, við teimum broytingum, sum vóru gjørdar í 1976, galdandi í Føroyum. Ongar broytingar eru gjørdar vegna serføroysk viðurskifti, eftirsum ongin heimild til hetta finst í lógini. Telefonverkið hevur eftir rokning hjá kommunikatiónsministeriinum umsitið størsta partin av tí praktiska eftirlitsarbeiðnum, sum lógin krevur.

Kommunikatiónsministeriið sendir nú gjøgnum Ríkisumboðið nýtt uppskot til radiokommunikatiónslóg fyri Føroyar. Uppskotið byggir á galdandi lóg við teimum broytingum, sum vóru gjørdar í Danmark í 1986 og 1992, og er lagað eftir føroyskum viðurskiftum. Heimildin fyri hesum varð sett í lógina við broytingum í 1992.

Av broytingum í donsku lógini síðani 1976 kunnu serliga nevnast:

1) Meira útgreinaðar reglur um hvørji tól ikki eru umfatað av lógini, hvat skal leggjast dent á tá loyvir verða givin, og hvørjar treytir kunnu fylgja við loyvinum (§§ 1 og 3),

2) heimild hjá kommunikatiónsministeriinum til at gera reglur um marknaðarføring av radiotólum, herundir reglur umfataðar av EF-direktivi 91/263/EØF (§§ 4 og 4 a),

3) víðari heimildir at seta forboð fyri nýtslu av radiotólum (§ 5, stk. 2),

4) heimild til at gera nærri reglur um eftirlit, herundir reglur um atgongd hjá eftirlitsmyndugleikanum og um plombering av radiotólum (§ 6 a), og

5) reglur um sektaruppskot (bødefortlæg).

Av broytingum, sum kommunikatiónsministeriið skjýtur upp verða gjørdar við ígildissetanina í Føroyum, kunnu serliga nevnast:

1) Landsstýrið yvirtekur sambært § 1 umsitingina av øllum sendilyvum til tól, sum ikki ganga inn í tað almenna sendinetið, tað vil í høvuðsheitum siga øll tól uttan tey, sum Telefonverkið rekur. Grundgevingin hjá Generaldirektoratinum fyri P&T fyri at halda hesi tól uttanfyri er "disse anlægs omfang og betydning, særligt i international sammenhæng." Ein onnur grundgeving er ivaleyst, at Telefonverkið annars í praksis hevði havt eftirlit við sær sjálvum. Í Danmark er ein stórur partur av virkseminum á teleøkinum lagt út til privat partafeløg, so sjálvt um kommunikatiónsministeriið umstur øli loyvir, ger hesin trupulleikin seg ikki í sama mun galdandi í Danmark.

2) Kommunikatiónsministeriið skal samráðast við landsstýrið áðrenn tað tekur avgerðir eila ger reglur við heimild í lógini, sí t.d. § 1, stk. 2, § 3, stk. 1 og § 4, stk. 1. Hetta er tó ikki galdandi fyri avgerðir eftir § 1, stk. 1, tá loyvir eftir hesum stykki sambært kommunikatiónsministeriinum "ikke er et forhandlingsspørgsmål, idet en sådan tilladelse vil blive givet efter ansøgning, når bestemte vilkår er opfyldt." Heldur ikki er samráðingarskylda eftir § 5, eftirsum "formålet vil kunne forspildes, hvis der først skal forhandles med Færøernes landsstyre inden anvendelsen af radioanlægget kan forbydes.".

3) § 4 a. er strikað, ivaleyst tí, at Føroyar ikki eru við í EF.

4) eftir nýggjum § 4, stk. 2 er ásett, at gjøld fyri loyvir, sum landsstýrið gevur eftir § 1, stk. 1, fella til landskassan.

5) § 7 stk. 4 og 5 og § 7 a verða strikaðar, tá hesar reglur longu eru galdandi í Føroyum sambært aðrari lóggávu.

Telefonverkið mælir til, at lógin verður sett í gildi sum skotið upp av kommunikatiónsministeriinum.

Ætlanin hjá kommunikatiónsministeriinum er, at "tilladelsesuddannelse på Færøerne fortsat bevares under kommunikationsministeriets ansvarsområde. Instruktionsbeføjelser forbliver således hos ministeren, som tillige vil være ankeinstans for tilladelses- og kontrolfunktionen også for Færøerne."

Tá ið radiosamskiftið sostatt ikki í síni heild skal vera føroyskt ábyrgdarøki, er tað ikki annað enn rímiligt, at eitt møguligt hall hjá landsstýrinum orsakað av partvísu yvirtøkuni skal verða landskassanum óviðkomandi. Upplýsast kann, at umsitingin av radiosamskiftislógini í 1993 kostaði kr. 1.751.533, harav kommunikatiónsministeriið endurrindaði Telefonverkinum kr. 678.963, meðan restin var fíggjað við brúkaragjøldum.

Galdandi radiosamskiftislóg verður sambært justitsministeriinum við ígildissetanini av broyttu lógini sett úr gildi. Tað má sostatt ansast eftir, at sendiloyvini hjá Telefonverkinum, sum eru givin eftir galdandi lóg, og sum eftir uppskotinum framvegis skulu gevast av kommunikatiónsministeriinum, ikki detta burtur.

Við hesum fyrivarnum verður mælt til at taka undir við ígildissetan í Føroyum av broytingum

í radiosamskiftistøgini.

Uppskotið frá kommunikatiónsministeriinum til nýggja føroyska lóg, roknskapur hjá radioeftirlitinum fyri 1993, galdandi føroysk lóg og galdandi donsk lóg verða løgd við.

1. viðgerð 21. mars 1994. Málið varð beint í samferðslunevndina. Ikki liðugt viðgjørt vegna samgonguslit.

FL jnr. 1940-1/90.

149 Umskipan av Føroya Lívstrygging til partafelag

Ár 1994, friggjadagin 18. mars legði løgmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um umskipan av Føroya Lívstrygging til eitt partafelag.

§ 1. Landsstýrið stovnar tann 1. juli 1994 eitt lívstryggingarpartafelag.
Stk. 2. Landsstýrið kann í kunngerð áseta nærri reglur um stovnan og skipan av lívstryggingarfeløgum í løgtingslóg um tryggingarvirksemi, í tann mun atlitið til tryggingartakararnar ikki talar ímóti.

§ 2. Landsstýrið kann við góðkenning fíggjarnevndarinnar selja partabrøvini í tí í § 1 nevnda lívstryggingarpartafelagi.
Stk. 2. Sølan av partabrøvum fer fram í einum og til sama keypara.
Stk. 3. Tann í stk. 2 nevndi keypari hevur skyldu til í seinasta lagi 3 mánaðir aftaná keypið av partabrøvunum at bjóða trygg-

lagtingslov om omlægning af "Føroya Lívstrygging" til et aktieselskab.

§ 1. Landsstyret stifter pr. 1. juli 1994 et livsforsikringsaktieselskab.
Stk. 2. Landsstyret kan ved bekendtgørelse fastsætte nærmere regler om stiftelsen og indretningen af livsforsikringsaktieselskabet og kan tillade, at bestemmelserne om stiftelse af livsforsikringsselskaber i lagtingslov om forsikringsvirksomhed fraviges, i det omfang hensynet til forsikringstagerne ikke taler herimod.

§ 2. Landsstyret kan med finansudvalgets godkendelse sælge aktierne i det i § 1 nævnte livsforsikringsaktieselskab.
Stk. 2. Salget af aktier sker samlet til én og samme køber.
Stk. 3. Den i stk. 2 nævnte køber er forpligtet til senest 3 måneder efter købet af aktierne at udbyde mindst 20% af disse til

ingartakarunum í felagnum í minsta lagi 20% av partabrøvunum til keyps. Tey partabrøv, ið ikki á henda hátt verða seld til tryggingartakaranar innan eitt tíðarskeið uppá 3 mánaðir, kann tann í stk. 2 nevndi keypari sleppa undan at selja.

§ 3. Tað í § 1 nevnda lívstryggingarpartafelag yvirtekur stovningardagin øll rættindir og allar skyldur frá Føroya Lívstrygging, smbr. løgtingslóg nr. 64 frá 10. oktober 1966 um lívstryggingarvirksemi við seinni broytingum. Fyri hesa yvirtøku galda reglurnar í løgtingslóg um tryggingarvirksemi um avhending av eini tryggingarmongd ikki.
Stk. 2. Rættindi hjá tryggingarpartafelagnum eftir stk. 1 yvir virðisbrøvum, ið eru skrásett í Virðisbrævamiðstøðini, verða mett at vera skrásett í hesi.
Stk. 3. Tinglýsing av rættindum hjá lívstryggingarpartafelagnum sambært stk. 1 kann fara fram við støði í hesi lóg.

§ 4. Tann í løgtingslóg nr. 64 frá 10. oktober 1966 um lívstryggingarvirksemi nevnda landskassaábyrgd er framvegis galdandi fyri tær tryggingaravtalur, sum Føroya Lívstrygging hevur tann 1. juli 1994. Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur um innihaldið í ábyrgdini.

§ 5. Landsstýrið kann tilnevna ein lim í stýrið fyri tað í § 1 nevnda lívstryggingarpartafelag, so leingi tryggingarmongdin hjá felagnum fevnir um lívstryggingar, ið eru fevndar av tí í § 4 nevndu landskassaábyrgd.

§ 6. Luttakarar í tí í § 3 nevndu yvirtøku og stovnanin og sølan av partabrøvunum í lívstryggingarpartafelagnum sambært hesi lóg, koma ikki undir skattskyldu av nøkrum slag.

§ 7. Annars galda reglurnar í løgtingslóg um tryggingarvirksemi fyri tað í § 1 nevnda lívstryggingarpartafelag við teimum

forsikringstagerne i selskabet. De aktier, der ikke på denne måde er solgt til forsikringstagerne inden for en periode på 3 måneder, kan den i stk. 2 nævnte køber undlade at sælge.

§ 3. Det i § 1 nævnte livsforsikringsaktieselskab overtager pr. stiftelsesdagen samtlige rettigheder og forpligtelser fra "Føroya Lívstrygging", jf. lagtingslov nr. 64 af 10. oktober 1966 med senere ændringer. For denne indtræden gælder bestemmelser i lagtingslov om forsikringsvirksomhed om overdragelse af en livsforsikringsbestand ikke.
Stk. 2. Livsforsikringsaktieselskabets rettigheder efter stk. 1 over fondsaktiver, der er registreret i Værdipapircentralen, anses for registreret i denne.
Stk. 3. Tinglysning af livsforsikringsaktieselskabets rettigheder i medfør af stk. 1 kan ske på grundlag af denne lov.

§ 4. Den i lagtingslov nr. 64 af 10. oktober 1966 nævnte landskassegaranti gælder fortsat for så vidt angår de forsikringsaftaler, der eksisterer i "Føroya Lívstrygging" pr. 1. juli 1994. Landsstyret fastsætter ved bekendtgørelse nærmere regler for indholdet af garantien.

§ 5. Landsstyret kan udpege et medlem af bestyrelsen i det i § 1 nævnte livsforsikringsaktieselskab, så længe selskabets forsikringsbestand omfatter livsforsikringer, der er dækket af den i § 4 nævnte landskassegaranti.

§ 6. Den i § 3 nævnte overtagelse samt stiftelsen og salget af aktierne i det af denne lov omfattende livsforsikringsaktieselskab medfører ikke skattepligt af nogen art for de implicerede.

§ 7. I øvrigt gælder lagtingslov om forsikringsvirksomhed for det i § 1 nævnte livsforsikringsaktieselskab med de særlige

serstøku frávikum, sum landsstýrið ásetir.

undtagelser, som landsstyret måtte fastsætte.

§ 8. Henda lóg fær gildi 1. juli 1994. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 64 frá 10. oktober 1966 um lívstryggingarvirksemi við seinni broytingum.
Stk. 2. Ársroknskapur hjá tryggingarpartafelagnum fyri 1994 verður gjørdur, grannskoðaður og góðkendur eftir reglunum í løgtingslóg um tryggingarvirksemi.

§ 8. Denne lov træder i kraft den 1. juli 1994. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 64 af 10. oktober 1966 om livsforsikringsvirksomhed med senere ændringer.
Stk. 2. Livsforsikringsaktieselskabets årsregnskab for 1994 udarbejdes, revideres og godkendes efter reglerne i lagtingslov om forsikringsvirksomhed.

Viðmerkingar

Lógaruppskotið er ein fylgja av avtaluni frá 12. oktober 1993 millum ríkisstjórnina og landsstýrið, har landsstýrið bant seg til at broyta lógina um Føroya Lívstrygging soleiðis, at landsstýrið ikki framvegis veitti ábyrgd fyri nýggjum tryggingum.

Eftir avtaluni frá 1. februar 1993 millum ríkisstjórnina og landsstýrið, bant landsstýrið seg til at nútímansgera alla tryggingarlógina og at leggja fram uppskot um hetta fyri løgtingið innan árið 1993 var úti. Hetta er gjørt, og liggja uppskotini nú til viðgerðar í løgtinginum.

Hetta uppskot er eins og hini uppskotini tilevnað av nevndini til kannan av tryggingarlóggávuni og landsstýrið tekur undir við uppskotinum hjá nevndini.

Avtøkan av ábyrgd landskassans fyri rakstrinum av Føroya Lívstrygging eftir løgtingslóg nr. 84 frá 10. oktober 1966 og hvussu Føroya Lívstrygging kundi rekast framvegis hevur kraft neyvar løgfrøðiligar kanningar, áðrenn gjørligt var hjá nevndini at koma við nøkrum lógaruppskoti um, hvussu tryggingin kundi skipast framvegis.

Nevndin skjýtur upp, at Føroya Lívstrygging, sum nú verður rikin sum serstakur stovnur við landskassaábyrgd, verður privatiserað og umskipað til eitt partafelag, sum kemur at umsita bæði tryggingarnar við landskassaveðhaldi eftir higartil galdandi reglum og nýggjar lívstryggingar uttan landskassaveðhald, aftaná at nýggja lógin er komin í gildi.

Rættarreglurnar fyri nýggja felagið verða reglurnar í hesi lóg og reglurnar í nýggju løgtingslógini um tryggingarvirksemi.

Uppskotið hjá nevndini er sum nevnt, at Føroya Lívstrygging eftir hesi løgtingslóg verður privatiserað og umskipað til eitt lívstryggingarpartafelag, sum landsstýrið setur á stovn. Síðani selur landsstýrið við góðkenning tíggjarnevndarinnar allan partapeningin í felagnum undir einum til **ein** keypara.

Eftir hesi loysn kann fyrisitingin av tryggingum við landskassaábyrgd og nýteknaðu tryggingarnar við ongari landskassaábyrgd fara fram í sama felag.

Aftaná løgfrøðiligar kanningar er nevndin komin til ta niðurstøðu, at einki forðar fyri, at Føroya Lívstrygging verður privatiserað sum skotið er upp, sjálvt um tryggingin hevur verið

rikin sum ein serligur stovnur við landskassaábyrgd.

Mett verður heldur ikki, at ein tílík privatisering við løgtingslóg, har krøvini hjá tryggingartakarunum og øðrum móti Føroya Lívstrygging verða vard, kann roknast sum nøkur ognartøka, ið hevur við sær skyldu at rinda endurgjald. Í hesum sambandi verður serstøk áherðsla løgd á, at grundaðar vónir hjá tryggingartakaranum um bonusveiting kunnu verða gingnar á møti á sama hátt, sum um privatiseringin ikki var farin fram.

Tað er sum nevnt í lógaruppskotinum ásett, at landskassin framvegis veitir ábyrgd fyri teimum tryggingum, ið eru teknaðar í Føroya Lívstrygging og fyri øðrum skyldum, sum verða yvirtiknar frá Føroya Lívstrygging.

Í viðtøkunum fyri nýggja lívstryggingarpartafelagið má tryggjast, at ognirnar í Føroya Lívstrygging í sambandi við privatiseringina eisini framvegis koma teimum gomlu tryggingartakarunum til góðar.

Grundaðar vónir um bonus frá teimum ikki avhendu virðunum verður tryggjað í treytunum um sølu av partabrøvunum í nýggja lívstryggingarfelagnum, smbr. § 2, stk. 1. Hesar treytir skulu ásetast við góðkenning fíggjarmyndarinnar, soleiðis at tann komandi meirilutapartaeigarin bindur seg til, at virðini so hvørt koma teimum tryggjaðu til góðar, so við og við sum ognirnar verða avhendaðar.

Fyri tær tryggingar og aðrar skyldur, ið teknaðar verða, ella felagið átekur sær, aftaná at lógin kemur í gildi, verður sum nevnt ikki veitt landskassaveðhald.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:
ad. § 1. Eftir uppskotinum kemur lógin í gildi 1. juli 1994. Treytin er tó, at løgtingslógin um tryggingarvirksemi ikki kemur í gildi seinni enn henda lógin.

Nevndin mælir til, at landsstýrið í sambandi við stovnanina av lívstryggingarpartafelagnum tilsamans setir 25 mió. kr. í felagið, harav sum partapening 10 mió., kr meðan 15 mió. kr. verður yvirkursogn.

Tekningin av nevndu upphædd fer annars fram eftir reglunum í partafelagslógini.

ad. § 1, stk. 2. Orsøkin til uppskotið um undantaksreglur er tann, at í sambandi við stovningina av nýggja lívstryggingarfelagnum kann tað vísa seg, at summar av reglunum í løgtingslógini um lívstryggingarvirksemi og partafelagslógini um stovnan av lívstryggingarpartafeløgum ikki verða mettar sum hóskandi í hesum føri. Ætlanin er tó ikki í størri mun at víkja frá stovningarreglunum í nevndu lógum. Í reglunum er tilskilað, at undantaksloyvi bert kann veitast, tá ið viðurskiftini hjá tryggingartakarunum ikki tala ímóti hesum.

Landsstýrið ásetur í kunngerð reglur um stovnan av lívstryggingarfelagnum. Stovningin skal sum nevnt fara fram eftir reglunum í løgtingslógini um tryggingarvirksemi og partafelagslógini og viðtøkurnar fyri felagið skulu verða gjørdar samstundis sum stovnanin fer fram og við støði í reglunum í partafelagslógini.

Í kunngerðini skulu ásetast greiðar reglur um viðurskiftini millum ogn, sum frammanundan

stovningini er í Føroya Lívstrygging og nýggju ognina til at lúka krøvini um grundfæ í mun til komandi tryggingarmongd, smbr. § 22 í uppskotinum til løgtingslóg um tryggingarvirksemi.

Kunngerðin skal eisini innihalda reglur um, nær landskassaábyrgdin kann gerast effektiv í sambandi við verandi tryggingarmongd og annars, hvussu ábyrgdin formelt verður givin mótvegis lívstryggingarpartafelagnum.

Tað er nevndarinnar meting, at samlaða ognin í lívstryggingarpartafelagnum eigur at verða býtt upp í A- og B-ogn, harav A-ognin er tann ogn, sum eru í Føroya Lívstrygging við stovnanina og sum fer inn í lívstryggingarpartafelagið sum tiltakspeningur fyri tær tryggingar, sum eru við stovnanina, meðan B-ognin er tann nýggi partapeningurin, samstundis lúka kravið í sambandi við komandi tryggingarmongdina.

Í kunngerðini skulu haraftrat ásetast reglur um, undir hvørjum treytum lívstryggingarpartafelagið skal seljast og krøv um roknskapar- og ognarbýtið millum tann partin av virksemi felagsins, ið viðvíkur verandi tryggingum í Føroya Lívstrygging og tann partin, ið viðvíkur framtíðar tryggingarmongdini.

Fara fram avsetingar undir og aftaná stovningina av lívstryggingarpartafelagnum, er tað A-ognin, sum er tøk til avsetingar uppá ognir, sum hava samband við ta verandi tryggingarmongdina.

Fara avsetingar fram uppá ymsar ognir, soleiðis at A-ognin verður minkað til eina upphædd, ið ikki svarar til basiskapitalkravið, sum kravt verður eftir lógini um tryggingarvirksemi fyri verandi tryggingarmongd í Føroya Lívstrygging, kann lívstryggingarpartafelagið gera landskassaábyrgdina galdandi, til krøvini til basiskapital aftur eru lokin.

Frammanfyri standandi uppbýti av ognini metir nevndin at vera neyðugt vegna serligu fíggjarligu viðurskiftini í Føroyum í dag, men eigur tørvurin á hesum uppbýti at endurskoðast aftaná at nøkur ár eru liðin við atliti at at leggja A- og B-ognirnar saman.

ad. § 2, stk. 1. Landsstýrið kann samtykkja at selja ognirnar í lívstryggingarpartafelagnum til ein investor, sum mettur ve. ur førur fyri at reka felagið forsvarliga.

Landsstýrið ásetur kursin á partabrøvunum við einari rakstrarætlan fyri felagið sum grundarlag.

Nevndarinnar meting er, at landsstýrið eigur at rokna við, at keyparin av partabrøvunum vil taka fyrivarni um, hvussu gjaldingin av partapeninginum verður framd.

Hetta fyrivarni kann vera orsakað av, at keyparin, vegna serligu fíggjarligu viðurskiftini í Føroyum í løtuni, vil tryggja sær, at partabrævakeypið ikki gevur honum tap um so er, at burturleggingar mugu gerast uppá ognirnar úr Føroya Lívstrygging, og sum knýta seg til A-ognina, aftaná keypið av partabrøvunum.

Fyri at sleppa undan hesi støðu, kann keyparin rinda eina minni avtalaða upphædd og deponera restina upp til keypsprísin í peningastovni ella góðkendum deponeringsstað.

ad. § 2, stk. 2. Nevndin hevur mett, at sølan av partabrøvunum eigur at fara fram til ein og sama keypara.

Grundin fyri hesi reglu er, at landsstýrið á henda hátt fær sama kurs fyri øll partabrøvini ug vandi ikki verður fyri at landsstýrið ikki fær selt øll partabrøvini.

ad. § 2, stk. 3. Ætlanin við hesi áseting er at geva tryggingartakarunum møguleika fyri at verða medeigarar av felagnum og harvið fáa ávirkan á raksturin, við tað at keyparin av lívstryggingarpartafelagnum bindur seg til at bjóða í minsta lagi 20% av partapeninginum til sølu millum tryggingartakararnar í felagnum.

Av praktiskum orsøkum er tíðarfreistin fyri skipaðu søluni av hesum partabrøvunum avmarkað til tríggjar mánaðir.

Aftaná at henda freist er lokin, dettur skyldan til at selja í minsta lagi 20% av partapeninginum burtur. Einki er tó til hindurs fyri, at felagið leingir hesa freist, tó soleiðis at tað hereftir ikki er nøkur skylda at selja í minsta lagi hesi 20%.

ad. § 3. Tryggingartakararnir í Føroya Lívstrygging verða hereftir tryggingartakarar í lívstryggingarpartafelagnum og tá teirra rættarstøða ikki verður verri av hesum, kunnu teir ikki av hesi orsøk uppsiga teirra tryggingar.

Av tí at rættarstøðan hjá tryggingartakaranum á henda hátt er tryggjað, koma reglurnar í løgtingslóg um tryggingarvirksemi ikki í nýtslu.

ad. § 4. Ábyrgd landskassans fevnir um øll krøv, ið kunnu gera seg galdandi eftir eini tryggingaravtalu, sum er teknað í Føroya Lívstrygging áðrenn privatiseringina, og broytingar í tílíkum avtalum aftaná privatiseringina, sum tryggingartakarin hevur rætt til at fáa gjørdar, tó ikki um talan er um eina heilt nýggja trygging.

Ivi kann stinga seg upp um hvussu langt § 4 røkkur, men nevnast kann t.d. at tryggingarfelagið, sum keypti Statsanstalten for Livsforsikring frá umboði statsins í nevndini m.a. fekk góðkent, at broyting í tryggingargjaldinum fyri eina trygging til rindan av muninum millum arbeiðsførleikatap og eftirlønaruppsparing ikki er ein broyting, ið ger at ábyrgdin dettur burtur, eins og ein útsett útgjalding av tryggingarupphædd heldur ikki er ein tílík broyting. Í einstøku málunum hevur áherðsla verið løgd á hvat tryggingartakarin við góðari grund hevur rætt til at vóna og hvat, ið broytast kundi í avtalunum uttan at ein kann siga, at ein heilt nýggj trygging er gjørd.

Mælt verður til, at donsku reglurnar um tulking av reglunum verða fylgdar.

Landskassaábyrgdin forðar ikki fyri, at lívstryggingarpartafelagið eftir løgtingslógini um tryggingarvirksemi §§ 86-87 handar alla sína tryggingarmongd ella ein ávísan part av henni til eitt dótturfelag ella eitt annað felag, við tað at landskassaábyrgdin framvegis vil verða galdandi fyri tær tryggingar, sum teknaðar eru við landskassaábyrgd. Sum víst er á omantyri, fevnir landskassaábyrgdin ikki um tær skyldur, sum lívstryggingarpartafelagið átekur sær aftaná stovningina.

ad. § 5. Í viðtøkunum fyri lívstryggingarpartafelagið verður ásett, at landsstýrið kann tilnevna ein lim í nevndina, so leingi ein partur av tryggingarmongdini kemur undir landskassaábyrgdina eftir § 4 í lógini.

Góðkenning krevst frá tí av landsstýrinum tilnevnda limi til fylgjandi avgerðir:
Avtøka ella broyting av eini sertreyt um vinningsbýti ella úthýting, avhending av tryggingarmongdini ella einum parti av hesi, avhending ella annað skifti av partabrøvum í felagnum og samanlegging ella likvidatión av felagnum.

Annars galda reglurnar í løgtingslógini um tryggingarvirksemi og partafelagslógini um nevndarval.

ad. § 6. Nevndin metir, at tann í § 3 nevnda yvirtøka av rættindum og skyldum frá Føroya Lívstrygging og søla av partabrøvum frá tí í § 1 nevnda lívstryggingarpartafelagi, smb. § 2, ikki eigur at koma undir skattskyldu av nøkrum slag fyri partarnar, t.v.s. keypara ella seljara.

Sølan av partabrøvum eftir § 2, stk. 3, til tryggingartakara ella onnur vil koma undir vanligu reglurnar í skattalógini um skattskyldu.

ad. § 7. Virksemið hjá lívstryggingarpartafelagnum kemur undir reglurnar í løgtingslógini um tryggingarvirksemi, við undantak av teimum frávikum, ið ásett verða eftir § 1 í lógini.

1. viðgerð 22. mars 1994. Málið varð beint í idnaðarnevndina. Burturdottið vegna samgonguslit.

150 Løgtingslóg um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leski-drykkir.

§ 1. Henda lóg fevnir um íløt til øl, mineralvatn og aðrar lidnar leskidrykkir.

lagtingslov om emballage til øl, mineralvand og færdige læskedrikke.

§ 1. Denne lov omfatter emballage til øl, mineralvand og andre færdige læskedrikke.

§ 2. Loyvt er ikki at flyta inn ella at selja tær í § 1 nevndu drekkavørur í eingangsfløtum, t.e. fløt sum bert einaferð verða nýtt til upprunaliga endamálið.
Stk. 2. Ásetingin í stk. 1 fevnir tó ikki um innflutning og sølu av lidnum leskidrykkjum uttan kolsýruinnihald í pappfløtum.

§ 2. Det er ikke tilladt at indføre eller sælge de i § 1 nævnte drikkevarer i engangsemballage, dvs. emballage der kun bliver brugt én gang til det oprindelige formål.
Stk. 2. Bestemmelsen i stk. 1 omfatter dog ikke indførsel og salg af færdige ikke kulsyreholdige læskedrikke i emballage fremstillet af pap.

§ 3. Landsstýrið kann seta í verk reglur um avmarking ella forboð móti ávísum fløtum til tær í § 1 nevndu drekkavørur.

§ 3. Landsstyret kan iværksætte regler om begrænsning eller forbud mod bestemt emballage til de i § 1 nævnte drikkevarer.

§ 4. Toll- og Skattstova Føroya kann krevja, at framleiðarar/innflytarar av teimum í § 1 nevndu drekkavørum skulu prógva, at innsavningar- og returskipan er til staðar, sum tryggjar, at fløtini verða send aftur til endurfylling.

§ 4. Toll- og Skattstova Føroya kan kræve, at producenter/importører af de i § 1 nævnte drikkevarer skal bevise, at indsamlings- og returordning er til stede som sikrer, at emballagen bliver returneret til med henblik på genfyldning.

§ 5. Landsstýrið kann seta í verk reglur fyri pantskipanum fyri fløt til tær í § 1 nevndu drekkavørur og kann áseta støddina á pantinum.

§ 5. Landsstyret kan iværksætte regler om pantordninger for emballage til de i § 1 nævnte drikkevarer og kan fastsætte pantets størrelse.

§ 6. Brot á hesa lóg verða sektað og hald verður lagt á ólógliga innfluttu ella seldu vøruna í nevndu fløtum. Reglurnar í § 18 og kap. 9 og 10 í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll verða nýttar samsvarandi.

§ 6. Overtrædelse af denne lov straffes med bøde og de ulovligt indførte eller solgte varer i den nævnte emballage konfiskeres. Reglerne i § 18 og kap. 9 og 10 i lagtingslov nr. 121 fra 23. december 1991 finder tilsvarende anvendelse.

§ 7. Henda lóg fær gildi 1. juli 1994. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 79 frá 27. juli 1989 um forboð móti innflutningi og sølu av øli, mineralvatni o.ø. lidnum leskidrykkjum í dósum og eingangsfløskum.

§ 7. Denne lov træder i kraft 1. juli 1994. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 79 fra 27. juli 1989 om forbud mod indførsel og salg af øl, mineralvand o.a. færdige læskedrikke i dåser og engangsflasker.

Viðmerkingar:

Tættari handilssamband við fleiri grannalond og broytingar í marknaðarføring av serliga mineralvatni og leskidrykkjum gera, at vit av umhvørvisorsøkum eiga at endurnýggja lógina fyri fløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir.

Sum kunnugt varð bann ímóti innflutningi og sølu av øli, mineralvatni og øðrum evnum í "stubby" fløskum sett í gildi 15. juli 1972 við lóg nr. 32 frá 1. juni 1972. Grundgevingin fyri lógini var, at burturkastingin av "stubby" fløskum dálkaði náttúruna í eitt slíkt mát, at metti var neyðugt, at forboðsregla fyri innflutningi av "stubby" fløskum varð sett í gildi. Víst varð herumframt á, at "stubby" fløskurnar verða ikki tiknar aftur av bryggjariunum.

Lógin er síðan endurnýggjað, fyrstu ferð við lóg nr. 45 frá 24. mai 1974, tá orðingin gjørdist einbrúksfløt, og síðan við núgaldandi lóg nr. 79 frá 27. juli 1989, har umframt øl og mineralvatn, eisini varð sett forboð ímóti innflutningi og sølu av leskidrykkjum í dósum og eingangsfløskum.

Andin í lógini samsvarar væl við støðugt harðnandi rákið í altjóða umhvørvispolitikki, nevniliga, at tað er framleiðarin (og innflytarin hansara vegna), sum skal reika so fyri, at framleiðarin fær emballagina aftur, annaðhvørt til beinleiðis at brúka aftur ella til góðkenda burturbeining í heimlandinum.

Soleiðis sum handilsmynstrið hevur verið fram til 1990'ini, hevur nevnda lóg, saman við fløskugjaldinum, tryggjað okkum eina valvirkandi endurnýtsluskipan fyri fløskur til mineralvatn og øl, so næstan hvør einasta fløska verður latin bryggjariunum aftur, har tær verða vaskaðar og endurfyltar. Innflutningurin av øli og mineralvatni hevur fyri tað mesta verið úr Danmark, og føroysku bryggjaríini hava kunna tikið ímóti teimum tómu fløskunum frá smáinnflytarunum. Danmark hevur jú rættiliga líkar treytir sum vit á hesum økinum.

Seinnu árini er støðan heilt broytt. Nú gerst alt meira vanligt at selja mineralvatn og leskidrykkir í stórum fløskum ella dunkum. Hesi íløt eru ofta úr plastikki, og oftа ikki ætlað til endurnýtslu.

Brúkaramir hava tikið væl ímóti hesum nýggju íløtunum, og tey eru sostatt helst komin fyri at vera. Tað eiga vit ikki at royna at gera nakað við. Men tað vit kunnu gera er at tryggja, at verandi returskipanir ikki vera oyðilagdar, ti hetta hevði verið til stóran skaða fyri okkara umhvørvi.

Fleiri orsøkir tala fyri at nýta endurnýtsluíløt til øl, mineralvatn og tíðnar leskidrykkir. Umhvørvisliga hava hesi íløt ein fyrimun í mun til eingangsíløt, tá antin dálka náttúru, dálka við avbrenning ella krevja orku til endurframleiðslu. Endurvinningaríløt høvdu vit verið noydd at senda av landinum til endurvinning ella vit skuldu brent tey í Føroyum (við hert partvísum møguleika fyri endurvinning til hita). Í báðum førum skuldu vit innflutt nýggj íløt í staðin fyri. Landsbúskaparliga er tað tí eisini ein fyrimunur at nýta endurnýtsluíløt.

Heilsølur, smásølur og framleiðarar av mineralvatni og tíðnum leskidrykkjum hava eisini gjørt landsstýrið vart við, at tey ynskja, at vit halda fast við endurnýtsluíløt.

Tað ber til at halda fast við høvuðsregluna í núverandi lóg, nevniliga forboðið móti eingangsíløtum, uttan at hetta virkar sum eitt forboð móti teimum stóru plastfløskunum. Í dag finnast góðar endurnýtsluíløskur úr plastic á marknaðinum, og vera tær eisini seldar í Føroyum.

Somu reglur eiga at vera galdandi fyri føroyska framleiðslu sum fyri innflutning. Hetta merkir, at síðani tað verður krav av føroysku framleiðarunum, at teir skulu brúka endurnýtslufløskur/íløt, eigur hetta eisini at vera ófrávíkiligt krav til allan innflutning og sølu eisini. Tað eigur at vera álagt innflytarum eins og føroysku framleiðarunum at tryggja, at returskipanir fyri fløskur/íløt virka.

Um vit hinvegin høvdu loyvt sølu av øli, mineralvatni og lidnum leskidrykkjum í endurvinningar- ella eingangsfløskum/íløtum, skuldi hetta eisini verið galdandi fyri føroysku framleiðsluna. Stórur vandi hevði tá verið fyri, at núverandi returskipan datt niðurfyri, eisini fyri ølfløskur.

Føroya landsstýri roknar ikki við, at henda skipanin kemur at vera orsøk til ákæru um kappingaravlagandi tiltøk frá eitt nú EF. Í Danmark eru reglurnar tær, at íløtini skulu vera góðkend, og at einans endurnýtsluíløt verða góðkend. Endurvinningaríløt kunnu tó nýtast undir ávísum treytum, tá tað snýr seg um innflutning. Danmark hevur roynt seg við eini kvotaskipan fyri innflutningi í ikki góðkendum íløtum. EF-dómstólurin kundi ikki góðtaka hesa skipan, tá tað snúði seg um innflutning av vørum frá øðrum limalondum.

Viðvíkjandi íløtum til vín og brennivín heldur Føroya landsstýri ikki, at tað er neyðugt við serligari lóggávu, við tað at landið sjálvt, gjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins, stendur fyri innflutninginum. Rúsdrekkasøla landsins hevur sett innsavningar- og pantskipan í verk fyri vín- og rúsdrekkafløskur.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Viðv. § 2 - Allýsingar:

Endurnýtslufløska/flat:	Fløska/flat sum verður nýtt fleiri ferðir, t.v.s. verður send aftur til framleiðara til endurfylling.
Eingangsfløska/flat:	Fløska/flat sum bert einaferð verður nýtt til upprunaliga endamálið, t.d. endurvinningar-fløska/flat.
Endurvinningarfløska/flat:	Fløska/flat sum aftaná nýtslu verður nýtt til annað endamál enn tað upprunaliga, t.d. sum nýggj plastrávøra.

Viðv. § 3:
Ein av fortreytunum fyri tí vælvirkandi føroysku returskipanini er, at talið av fløskusløgum á marknaðinum er avmarkað. Skotið verður tí upp, at avmarkingar ella forboð kunnu verða sett móti ávísum sløgum av íløtum. T.d. kundi ein góðkenningarskipan verið sett í verk, ið líkist tí donsku, har krøvini til góðkenning fremst verða sett fyri at tryggja returskipanina og endurnýtsluna. Landsstýrið vil tó í fyrsta lagi royna at sleppa undan at seta slíka skipan í verk, men vil heldur royna at fáa eina sjálvbodna skipan at virka.

Viðv. § 5:
Núverandi pantskipan fyri øl- og sodavatnsfløskur eru sjálvboðin skipan, sum føroysku framleiðararnir og innflytararnir hava sett í verk. Henda skipan hevur virkað væl, og landsstýrið heldur, at henda og líknandi skipanir framvegis eiga at vera sjálvboðnar. Við einum vaksandi talið av ymiskum fløskum á føroyska marknaðinum heldur Føroya landsstýri tó, at tað er neyðugt, at landsstýrið fær neyðugar heimildir til at tryggja, at innsavningar- og returskipanirnar eisini koma at virka frameftir.

Pantupphæddin eigur at verða uppkravd í øllum liðum frá framleiðara/innflytara til endaliga brúkaran, og eigur at vera ásett við atliti til faktiska virðið á ílátunum, og somikið høgt at ílátini veruliga verða send framleiðaranum aftur.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í umhvørvisnevndina, sum 15. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1994 beint í umhvørvisnevndina.

Umhvørvisnevndin hevur viðgjørt máliið og tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 21. apríl 1994. Uppskotið samtykt við 25-0 atkvøðum.

3. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

FL jnr. 2705-3/91.

Lóg nr. 73 frá 10. mai 1994.

151 Frádráttur í sjálvuppgávuni fyri gávur til vælgerandi endamál, umvælingar av sethúsum v.m.

Ár 1994, friggjadagin 18. mars legði Niels Pauli Danielsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 33 verður sum nýtt nr. 13 sett: "Skjalprógvaðar gávur til kristiligt og manngott arbeiði við upphædd, sum er oman fyri 500 kr., upp til 3.000; hjá hjúnum upphædd, sum er oman fyri 1.000 kr., upp til 6.000 kr.".
2) Í § 33, nr. 11 verður sett at galda fyri umvælingar v.m. alt 1993.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 33 indsættes som nyt nr. 13: "Dokumenterede gaver til kristeligt og humanitært arbejde med beløb, der overstiger 500 kr. op til 3.000 kr.; for ægtefæller beløb, der overstiger 1.000 kr., op til 6.000 kr."
2) § 33, nr. 11 sættes til at gælde for istandsætning m.m. i hele 1993.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar

Føroyingar hava altíð givið nógv til kristiligt og manngott arbeiði. Tað hevur ikki staðið á, tá ið fólk eru komin í neyð og skulu hava hjálp.

Sjálvbodnu felagsskapirnir hava verið sera væl studlaðir í Føroyum.

Men ráðini hjá fólki til at veita stuðul eru nógv versnað tá seinastu tíðina. Viljanum bagir einki, men nógv standa illa í tí og hava ongan pening at geva. Skatturin fer við sínari stívu helvt, rentan er eingin, og útreiðslurnar til bústað, klæði og mat eru eisini stórar. Tá er lítið eftir, ið loypur av til at studla við og geva burturav.

Ikki kunnu vit vera tað arbeiðið fyriuttan, sum gjørt verður gjøgnum sjálvbodnu felagsskapirnar. Serliga nú, ið tíðirnar eru so ringar.

Í grannalondum okkara hevur tann siður leingi verið nýttur, at gávur til vælgerandi endamál er loyvdur frádráttur í sjálvuppgávuni.

Í Danmørk er upphæddin 3.000 kr., sum hvør persónur kann draga frá, tá ið gávan er 3.500 kr. Hjún kunnu draga upp til 6.000 kr. frá, tá ið tey geva 7.000 kr.

Henda skipan kemur øllum teimum mongu sjálvbodnu felagsskapunum sera væl við, ikki minst teimum feløgum, sum veita neyðstøddum hjálp, bæði innanlands og uttanlands, sum t.d. Neyðhjálp Fólkakirkjunnar, Caritas, Reyða Krossi o.ø.

Tað er eink at taka seg aftur í, at ein sovorðin frádráttarskipan í Føroyum kemur væl við hjá øllum tí sjálvbodna arbeiðinum, og tað hevði eisini sýnt, at myndugleikar landsins taka undir við hesum arbeiði. Skotið verður upp at nýta somu tøl sum í Danmørk.

Hin broytingin, sum skotin verður upp at gera í skattalógini, er, at umvælingar til sethús, sum kunnu dragast frá í 1993 og 1994, ikki bara skulu verða gjørdar eftir 28. mai 1993, sum kunngerðin frá 6. august 1993 ásetir. Henda kunngerðin er gjørd við heimild í lógini, ið varð lýst hin 27. mai 1993. Umvælingar, ið farið varð undir, tá ið tað frættist, at lógin var løgd fram og samtykt í løgtinginum, er frádrátturin ikki galdandi fyri. Hildið verður, at lógin eigur at galda fyri allar umvælingar av sethúsum í 1993, tá ið frádrátturin er fyri alt árið eins og 1994.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og setir eink uppskot fram.

2. viðgerð 22. apríl 1994. Uppskotið fall við 4-0 atkvøðum.

152 Stovnsetan av toll- og avgjaldsfríum havnum, vørugoymslum og framleiðsluøkjum

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at gera lógaruppskot, sum gera nakrar føroyskar havnir, goymsluhøli og framleiðsluøki toll- og avgreiðslufrí, av tí at slík fríøki menna virksemið og eru arbeiðsskapandi við vøruumskipan, vørugoymslu og framleiðslu til útflutnings.

Viðmerkingar

Flest onnur lond stuðla sínum egna búskapi við at taka burtur kostnaðardýrkandi forðingar fyri framleiðslu, umsetningi og flutningi, serliga útflutningi av vørum og tænastum. Vil ein hava meir av einum tingi, skal ein stuðla tí.

Men vil ein haraftanímóti hava minni av einum tingi, skal ein skatta tað. Hetta seinra tykist vera regulin í Føroyum. Skattlegging av øllum ul frama fyri almenna sektorin og upp á bekostning av einstaklingum og vinnuni darvar aimikið vøruflutningi, handli og framleiðslu okkara, eisini til útflutnings.

Hetta uppskotið hevur til endamáls at gera Føroyar í størri mun enn nú til ein depil í Norðuratlantshavi fyri umskipan av fiska- og fiðnaðarvørum sjóvegis og at bøta møguleikarnar fyri, at føroysk framleiðslufyrvinna til útflutnings og heimamarknaðin fær lagaligari fíggjarlig kor at framleiða undir.

Okkara grannar og kappingarnevtar hava langt síðani fingið sær fríhavnir, frígoymslur og okkurt enntá toll- og avgjaldsfrí øki til framleiðslu. Á henda hátt hava tey bygt upp flutningsdeplar (transithavnir) og avgjaldsfrítikin framleiðsluøki, sum geva nógv arbeiði og inntøkur.

Men okkara sjóvegis flutningur er enn darvaður av vørugjaldi á tí, sum verður lagt upp á land í og/ella ført avstað aftur úr Føroyum. (Landaður fiskur ber ikki vørugjald, men avskipaður fiskur stríðist við hetta dýrkandi almenna ítriv).

Skipafeløg, oljufeløg, salt- og fiskasølur dragast við millióna upphæddir í útreiðslum til vørugjald, sum hetta uppskotið hevði loyst okkara flutnings- og handilsvinnu úr.

Kundu rávørur og tíðug framleiðsla, sum nú verður sigid uttan um Føroyar til frí- og umskipingarhavnir í grannalondum okkara, verið løgd upp her avgjaldsfrí, gav tað kanska

nakað minni í havnagjøldum, men meir arbeiði og tískil meir samfelagsligt avkast frá nógvum arbeiðsplássum. Harumframt kundi farmaskipafloti okkara fingið fitt ískoyti frá øktum flutningsuppgávum.

Tann almenna fyrisiting, sum krevst og kostar pening til at umsita vørugjaldið, er eisini ein útreiðsla, sum bert verður goldin av eini vinnu, hvørs inntøkur minka av darvandi byrokratiskum fótonglum.

Kostnaðurin av at umskipa t.d. frystan fisk úr eitt nú Rusiandi og ferskan fisk úr eitt nú Íslandi eru nýggj dømi um óhepnu avleiðingarnar av, at landsstýrið hugsar meir um at pína nakrar krónur til almenna nýtslu burtur úr flutingsvinnuni ístaðin fyri at vinna meiri pening úr inn- og útfluningi sum geografiskt vælvalt millumlið hjá grannalondum okkara.

Frígoymslur, avsett avgjaldsfrítikin øki og pakkhús til rávørur hjá framleiðsluvinnuni høvdu lætt almikið um likviditetin hjá fyritøkum og virkjum, sum nú verða knokkað av politiskt áløgdum kostnaðarforðingum.

Høvdu framleiðslu og handverksvirki heilt sloppið undan at goldið avgjøld á rávøru, tá talan var um framleiðslu til útflutnings, og til heimamarknaðir - eisini sloppið undan at avrokna nakað dýrkandi avgjald, fyrrenn vøran verður seld innanlands, so høvdu slík fríøki lagt lunnar undir útflutningsvinnuna og styrkt kappingarførið hjá heimavinnu. Framleiðsluvinnan stríðist sum er undir vónleyst kappingaravlagandi korum. Hetta uppskotið kundi høtt væl um.

1. viðgerð 24. mars 1994. Málið varð beint í íðnaðarnevndina, sum 21. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Állt

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð tann 24. mars 1994 beint í íðnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Jacob Lindenskov, Kari Heri Joensen og Flemming Mikkelsen) setir eingi uppskot fram. Meirilutin vísir á kap. 7, § 12, 3. stk. í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll, sum er soljóðandi: "Landsstýrið kann seta á stovn fríhavnir og frígoymslur undir eftirliti av tollvaldinum. Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur viðvíkjandi hesum."

Minnilutin (Jógvan Sundstein) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot fólkafloksins.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið fall við 10-0 atkvøðum.

153 Skattafrádráttur fyri fiski- og útróðrarmenn

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Niels Pauli Danielsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verður gjørd hendа broyting:

Í § 3 verður sett sum nýtt stk. 6:

"Fiski- og útróðrarmonnum verður veittur serligur frádráttur, sum fyri langfarafiskimenn er 30.000 kr., fiskimenn á nærleiðum og útróðrarmenn 20.000 kr. at galda fyri 1994 og frameftir.

§ 2.

Hendа lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 af den 1. september 1983 om fastsættelse af skat til landskassen med senere ændringer foretages følgende ændring:

I § 3 indsættes som nyt stk. 6:

"Fiskere på langfart og hjemmefiskere ydes et særligt fradrag, som for fiskere på langfart er kr. 30.000 og hjemmefiskere kr. 20.000 at gælde for 1994 og fremover."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar

Tað er neyðugt, at gongd fæst á aftur hjá okkum, og tað tænir ongum endamáli at leggja uppaftur fleiri byrðar á virkandi fólk okkara á sjógvi og landi.

Tað skapti miklan framburð í Føroyum, tá ið havfiskiskapurin tók seg fram, og tað legði lunnar undir arbeiði á landi til nógvar hendur, so at fólkatalið øktist í stórum.

Nú er øðrvísið vorðið. Stórt arbeiðsloysi ræður, sum eingi útlit eru fyri fer at minka í hræði sambært donsku ráðleggingarnevndini. Nógv fólk flytir av landinum, og bygdasamfeløgini eru nú av álvara farin at merkja burturflytingina.

Vit mega steðga hesi gongd, og ein háttur at gera tað uppá er, at teir verða studlaðir, sum veiða fiskin og flyta hann til lands. Í øðrum londum verður hetta gjørt við, at fiskimenn og útróðrarmenn fáa ein serligan skattfrádrátt. Tað hevur eisini verið í gildi í Føroyum fyrr og vísast kann til samtykt løgtingsins um at veita langfarafiskimonnum eina serliga viðbót fyri telefonútreiðslur fyri árið 1993, sum løgtingið ynskir eisini komur at galda fyri 1994 og framyvir. Játtaðar eru á fíggjarlógini 2,8 mió. kr.

Fiskivinnan er høvuðsvinnan, og haðani stavar allur útflutningur okkara.

Tað verður ein sonn ólukka, um eisini fiskimenn í stórum tali verða noyddir at flyta burtur í onnur lond, har teir kunnu lívbjarga sær og sínum betur.

Taka vit inntøkutrygdina burtur frá teimum, sum uppskot liggur í løgtinginum um at gera, máa vit støðið undan okkum sjálvum.

Heldur eiga vit at veita fiski- og útróðrarmonnum góðar sømdir og góð kor at virka undir, sum gjørt verður í grannalondum okkara og tað svitast ikki, at tað fer at síggjast aftur í øktum virksemi og hægri útflutningi.

1. viðgerð 24. mars 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 21. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 18. mars 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og setir eingi uppskot fram.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið fall við 4-0 atkvøðum.

154 skattafrádráttur fyri rentur til sethúsalán

Ár 1994, friggjadagin 18. mars legði Niels Pauli Danielsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verður gjørd henda

lagtingslov om ændring i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 af den 1. september 1983 om fastsættelse af skat til landskassen med senere ændringer foretages følgende

broyting:

Í § 4, stk. 1 og 4, og § 4a, stk. 1, 2 og 3 verður "27%" broytt til: "37%".

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

ændring:

I § 4, stk. 1 og 4 og i § 4a, stk. 1, 2 og 3 ændres "27%" til: "37%".

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter kundgørelsen.

Viðmerkingar

Trupulleikin hjá sethúsaeigarum er ein annar stórur vandi, sum hóttir føroyska samfelagið.

Hesin trupulleiki gerst uppaftur størri, tá ið vit hava eitt annað húsetingarmynstur enn í grannalondum okkara sum t.d. Danmørk, har stórur partur av fólkinum ikki býr í egnum húsum, men leigar sær íbúð. Vandi er fyri, at danska stjórnin og maðurin á gøtuni har ikki duga at skilja, at sethúsaeigararnir her hava hjálp fyri neyðini. Lánini í húsunum mugu niður, og almennu peningastovnarnir verða noyddir at strika stóran part av skuldini hjá sethúsaeigarunum, bæði bankarnir, sum landsstýrið eigur 100%, og Húsalánsgrunnurin v.m. Serliga illa eru tey ungu fyri, sum bygdu í áttatiárunum undir heilt øðrum fortreytum enn teimum, vit í dag hava. Víst kann verða til uppskot Kristiliga fólkaflokksins Føroya framburðs- og fiskivinnuflokks um loyvi til grunnarnar at rentunullstilla útlán og gera neyðsemju. løgtingsmál nr. 35/93: Loyvi til Húsalánsgrunnin, Menningargrunnin og Iðnaðargrunnin at rentunullstilla útlán og gera neyðsemjur (akkordir), sum liggur í fíggjarnevndini. Ein annar háttur hjá landsstýrinum at koma hesum til hjálpar er at loyva hægri rentufrádrátti, sum mælt verður til í hesum uppskoti.

Skotið verður upp, at rentufrádrátturin í landsskatti verður settur úr teimum núgaldandi 27%'unum upp til 37%. Rentufrádráttin í kommunuskatti, sum í dag er 13%, er eisini møguleiki at broyta, men tá ið hugsað verður um trupulleikarnar hjá kommununum, er hetta neyvan nakað, sum kann gerast í dag.

Tí eigur landsstýrið at taka á seg allan hin hækkaða frádráttin, tí at tað er landsstýrið, sum førir samráðingarnar við donsku stjórnina og higartil hevur gáðtikið, at trupulleikarnir hjá kommununum og sethúsaeigarunum verða hildnir uttanfyri.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og setir einki uppskot fram.

2. viðgerð 22. apríl 1994. Uppskotið fall við 6-0 atkvøðum.

155 Løgtingslóg um keyp av ognini matr. nr. 1340 e, Tórshavn

Ár 1994, friggjadagin 18. mars legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um keyp av ognini matr. nr. 1340 e, Tórshavn.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at keypa ognina matr. nr. 1350 e, Tórshavn.

§ 2. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka lán stórt 9.0 mió. kr. til keyp og umbygging av ognini.

§ 3. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om køb af ejendommen matr. nr. 1340 e, Tórshavn.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at købe ejendommen matr. nr. 1340 e, Tórshavn.

§ 2. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån stort 9.0 mio. kr. til køb og ombygning af ejendommen.

§ 3. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Arbeitt hevur verið í fleiri ár við ymiskum loysnum fyri at betra um hølisviðurskiftini hjá Maskinskúlanum, tí hølini eru vánalig og nógv tíð fer til spillis hjá lærarum og næmingum við tað, at skúlin liggur so spjaddur runt í Havnini.

Landsstýrinum stendur í boði at keypa ognina matr. 1340 e, og 800 m² av matr. nr. 1339 d. Tórshavn fyri 4.5 mió. kr. frá Realkredit Danmark.

Hetta er fyrrverandi bygningurin hjá P/F Wenzel Petersen við Oyggjarvegin.

Bygningurin:
Grundøkið er tils. 5860 m². Bygningurin er í 4 hæddum uppá tils. 2187 m² brutto og 2020 m² netto. Bygningurin er í góðum standi og er væleignaður at innrætta til maskinskúla. Á niðastu hædd er verkstaður, sum kann nýtast til maskinrúm, kølilaboratorium og verkstað uttan stórvegis broytingar. Á aðru hædd er ætlanin at innrætta el-laboratorium, á triðju hædd skúlastovur og á ovastu hædd felagshøli, lærarastova, teldurúm og umsiting.

Kostnaður:
Um bygningurin verður keyptur fyri 4,5 mió. kr., er fermetra-prísurin 4.500.000 : 2187 = **kr. 2.058,-**, sum er sera bíligt fyri ein slíkan bygning við einum grundøki uppá 5860 m².

Bygningurin kann innrættast til maskinskúla fyri uml. 4.5 mió. kr.. Tvs. at **saml. íløgan**

verður í mesta lagi 9 mió. kr.. hetta er miuni enn 1/3 av tí ein nýggjur skúlabygningur hevði kostað.

Við hesi ætlan fæst ein góður maskinskúlabygningur til ein fermetrapris uppá einans kr. 9.000.000 : 2187 = **kr. 4.115,-**, sum er 1/3 av einum nýggjum skúlabygningi.

Verandi hølisviðurskifti og leigutupphædd:
Føroya Maskinskúla leigar í dag hølir á 4 ymiskum støðum í Tórshavn, í tveimum bygningum hjá Valdemar Lutzen á Skálatrøð, hjá Carl á Lag úti við Strond, á Saltsøluni og í einum bygningi í Nóatúni. Leigan er tilsamans **kr. 900.000,-** árliga.

Við eini íløgu uppá 9 mió. kr. verður árliga gjaldið kr. **909.423,-** við eini aflurgjaldstíð uppá 20 ár og við eini rentu uppá 8% p.a.

Henda íløga gevur somu árligu húsaútreiðslur sum nú, men hølisviðurskiftini verða munandi betur, men sparing verður í tíð hjá lærarum og næmingum, tá alt er á einum staði.

Við at fara í gongd við umbyggingina beinanvegin, verður samstundis nakað av hart tiltrongdum byggiarbeiði sett í verk.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 22. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1994 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og ger vart við, at villur eru í § 1 í lógartekstinum og setir tí fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 1 verður orðað soleiðis:

"§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at keypa ognina matr. 1340 e, Tórshavn og 800 m² av matr. nr. 1339 d, Tórshavn."

"§ 1. Landsstyret bemyndiges til at købe ejendommen matr. 1340 e, Tórshavn og 800 m² av matr. 1339 d, Tórshavn."

Flemming Mikkelsen hevur hesa viðmerking:

Ásannandi tey sera truplu hølisviðurskifti, Maskinskúlin arbeiðir undir, og ikki minst, at hetta er stovnur, ið er við til at útbúgva ungdóm okkara at taka við verandi og komandi avbjóðingum bæði burturi og heima, heldur Flemming Mikkelsen tað vera av allarstørsta týdningi at fáa hølisviðurskifti skúlans í rættlag, og kann tí taka undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskot landsstýrisins við broyting fíggjarnevndarinnar samtykt við 27-0 atkvøðum.

3. viðgerð 27. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

FL jnr. 476-3/90.

Lóg nr. 58 frá 10. mai 1994.

156 Løgtingslóg um lántøku til landskassan

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um lántøku til landskassan.

§ 1. Landsstýrinum verður landskassans vegna heimilað at læna 120.000.000 kr.

§ 2. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om låntagning til landskassen.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at låne 120.000.000 kr.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter den bekendtgørelse.

Viðmerkingar

Í løgtingslóg nr. 184 frá 4. november 1993: Løgtingslóg um lántøku til landskassan, varð landsstýrinum landskassans vegna heimilað at læna 1,53 mia kr.

1,3 mia. kr. av hesum er farið til nýggjan eginpenig í bankunum, 100 mió. kr. fara til rentuna av 1,3 mia. kr. tað fyrsta árið, og 130 mió. kr. skulu lænast til fíggjarlógarhallið fyri 1994.

Landsstýrinum er eisini heimilað í lóg um umlegging av landskassalánum frá 20. desember 1991 at læna 50 mió. kr. til avdráttir til føroyskar bankar.

Heimild er sostatt at læna upp til 180 mió. kr. í sambandi við fíggjarlógina 1994.

Fíggjarlógarhallið skal sambært avtalunum við Danmark fíggjast við brævaláni. Ætlanin er somuleiðis at fíggja avdráttirnar til føroysku bankarnar við brævaláni.

Landsstýrið søkir við framløguni av hesum uppskoti um heimild at hækka lántøku landskassans við 120 mió. kr., so samlaða brævalánið verður 300 mió. kr.

Endamálið við hesi lántøku er ikki bert at útvega landskassanum gjaldføri, men eisini at byggja upp ein obligatiónsmarknað. Ætlanin við eyka gjaldførinum uppá 120 mió. kr. er at røkja lánsbrævamarknaðin, so partarnir á kapitalmarknaðinum skulu kunna síggja, at lánsbrøvini eru umsetilig virðisbrøv. Tað er neyðugt, at lánsbrøvini eru umsetilig, so lánsbrævaeigararnir, sum kunnu vera privatir persónar, virkir, peningastovnar almennir grunnar o.s.frv. bæði í Føroyum og Danmark, altíð kunnu selja lánsbrøvini, um teimum tørvar reiðan pening. Á henda hátt verður lagt støði undir lánsbrævamarknaðin, so tað at gera íløgur í hesi virðisbrøv verður ein áhugaverdur møguleiki hjá bæði privatum og almennum investorum.

1. viðgerð 22. mars 1994. Málið vard heim í fíggjarnevndina. Burturdottið vegna samgongusliti.

157 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1994, friggjadagin 18. mars 1994 legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um lands- skatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd hesa broyting:

§ 25, nr. 3 verður orðað soleiðis:

"renta ella vinningur av lánsbrøvum, partabrøvum og øðrum virðisbrøvum, av

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændring:

§ 25. nr. 3 affates således: "rente eller udbytte af obligationer, aktier og andre værdipapirer, af udestående fordringer og af udlånt kapital, dog ikke:

útistandandi fíggjarkrøvum og av útlændum peningi tó ikki:

a) Vinningsbýti frá partafeløgum, lutafeløgum o.ø. skrásett í Føroyum, sbr. § 1, nr. 8 - 16 í hesi løgtingslóg.
b) Renta av føroyskum lánsbrøvum. Sum føroysk lánsbrøv er at skilja lánsbrøv givin út í Føroyum av føroyskum almennum myndugleika, eftir góðkenning landsstýrins.
c) Renta av peningi útistandandi í føroyskum peningastovnum og postgiro, sum verður skattað sambært løgtingslóg um rentuskatt. Sbr. tó § 5, stk. 6 í hesi løgtingslóg".

§ 2.

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. § 25, nr. 3, litra b hevur gildi fyri rentuinntøku av føroyskum lánsbrøvum, ið er vunnin frá og við 1. apríl 1994.

a) Udbytte fra de på Færøerne registrerede aktieselskaber, andelsselskaber o.a. jfr. § 1 nr. 8 - 16 i denne lagtingslov.
b) Rente af færøske obligationer. Som færøsk obligation skal forstås obligation udstedt på Færøerne af færøsk offentlig myndighed, med godkendelse fra landsstyret.
c) Rente af indestående i færøske pengeinstitutter eller postgiro, som bliver beskattet i henhold til lagtingslov om renteskat. Jfr. dog § 5, stk. 6 i denne lagtingslov."

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Stk. 2. § 25 nr. 3 litra b har virkning for renteindtægter af færøske obligationer, der er optjent fra og med 1. april 1994.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins um broytingar í skattalógini og rentuskattalógini viðgera skatting av rentuni av føroyskum lánsbrøvum.

Landsbanki Føroya fyrireikar fyri landsstýrið útgávu av láns- brøvum, sum skulu seljast í Føroyum og Danmark. Brævalántøka hevur leingi verið í umbúna, men er nú eisini ein partur av teimum avtalum, sum landsstýrið og ríkisstjórnin hava gjørt síðan 6. oktober 1992.

Lánsbrøvini verða skrásett á tí danska "Værdipapircentralen" og noterað á "Fondsbørsen". Hesar skipanir gera tað ómaksleys at eiga og handla lánsbrøv. Í praksis verða tað peningastovnarnir, sum handla lánsbrøvuni fyri seg sjálvan og kundar sínar.

Búskaparpolitiskt hevur brævalántøka tann fyrimun í longdini, at tað leypandi er eitt betri samskifti millum lántakara og lángevara igjøgnum prísin, sum verður ásettur á kapitalmarknaðinum. Avtalurnar millum landsstýrið og ríkisstjórnina byggja lutvíst á hesa sannføring og lutvíst á ta semju, at hallið á løgtingsfíggjarlógini skal fíggjast á henda hátt.

Landsstýrið metir, at ein fyrimunur fyri, at ætlanirnar við útgávu av føroyskum lánsbrøvum skulu vera áhugaverdar fyri keyparar bæði í Føroyum eins væl og í Danmark, er, at skattaviðurskiftini viðvíkjandi vinninginum av lánsbrøvum verður so lagalig sum til ber. Eftir galdandi reglum kemur renta av lánsbrøvum undir skattskyldu eftir § 25, nr. 3 í skattalógini og sjálvi lánsbrøvini koma sum virðisbrøv eisini undir avgjaldsskyldu sambært løgtingslógini

um rentu- og fíggjarognaravgjald. og møguligur søluvinningur kemur undir reglurnar í Virðisbrævaskattalógini.

Ætlanir hava frá landsstýrisins síðu áður verið frammi um at broyta hesi viðurskifti og var í hesum sambandi. tá løgtingslóg nr. 87 frá 5. juni 1992 um rentuskatt varð sett í gildi. skapt heimild í rentuskattalógini fyri at skatta rentu av føroyskum lánsbrøvum eftir serreglunum í rentuskattalógini. Nevndu reglur. sum eru í rentuskattalógini. eru tó enn ikki settar í gildi. tá ætlanirnar við útvegan av lánsbrøvum hava drigið nakað út. Verandi heimild landsstýrisins í § 8 í rentuskattalógini fevnir um heimild til í kunngerð at ígildisseta omanfyri nevndu reglur eftir ummæli frá fíggjarnevnd løgtingsins. Nú tá ætlanirnar eru verðnar meira ftókiligar, metir landsstýrið neyðugt. sum liður í víðari fyrireikingini av nevndu ætlan, at fáa skattareglurnar viðvíkjandi lánsbrøvum broyttar.

Fyriliggjandi lógarbroytingar eru fylgibroytingar av omanfyri nevndu ætlanum. Broytingin í § 25 í skattalógini hevur við sær. at renta av føroyskum lánsbrøvum útgivin av føroyskum almennum myndugleikum gerst skattafrí. Rentuskattalógin verður broytt sum fylgibroyting av broytingunum í § 25 í skattalógini og ætlan landsstýrisins við hesum er, at føroysk lánsbrøv ikki skulu koma undir aðra skatt- ella avgjaldsskyldu enn fíggjarognaravgjald.

Landsstýrið metir rættast verða, samstundis sum broytingarnar í § 25 verða gjørdar. sum føra við sær. at renta av føroyskum lánsbrøvum ikki verður skattað sum vanlig inntøka, at gera broytingar í rentuskattalógini. sum gera. at reglurnar um rentuskatt av føroyskum lánsbrøvum ikki longur vera fevndar av rentuskattalógini hóast nevndu reglur formelt sæð ikki hava verið í gildi enn.

Av tí, at hugtakið "føroysk lánsbrøv" eftir broytingina í rentuskattalógini § 1, 2. stk. fellur burtur, hevur landsstýrið ístaðin nágreinað hugtakið í broytingaruppskotinum til § 25, nr. 3 b). Broytingin hevur við sær, at skattafrítøkan bert hevur gildi fyri lánsbrøv útgivin av føroyskum almennum myndugleikum.

Fyrimunurin heilt at frítaka føroysk lánsbrøv frá tí almenna fyri at svara rentuskatt er m.a. tann, at kravið frá keypara um hægri rentu av lánsbrøvunum verður minni, meðan ein rentuskattur væntandi hevði økt kravið frá keypara um hægri rentu. Tí hevði úrslitið aftaná rentuskatt verði óbroytt bæði fyri keypara og seljara av lánsbrøvunum uttan mun til. um rentuskattur varð álagdur ella ikki. Hetta merkir, at um so var, at landskassin hevði álagt ein rentuskatt á føroysk lánsbrøv, so hevdu rentuútreiðslurnar væntandi vaksið tilsvarandi.

Frftøka fyri at svara rentuskatt hevur eisini tann fyrimun við sær, at umsitingin av føroysku lánsbrøvunum verður munandi minni.

Aftaná hesar lógarbroytingar skuldi tað, alt annað líka, verði munandi meira áhugavert fyri persónar og felløg bæði í Føroyum og í Danmark at keypt føroysk lánsbrøv, enn ístaðin at plasera pening á t.d. vanliga innlánskonto uppá uppsøgn ella í donsk lánsbrøv.

Samanumtikið kann sigast, at ein stór søla av lánsbrøvum er m.a. treytað av, um skattaviðurskiftini viðvíkjandi vinninginum av føroyskum lánsbrøvum verða so lagalig sum til ber, t.d. samanborið við aðrar møguleikar at plasera pening. Aftaná omanfyri nevndu lógarbroytingar verður vinningur av føroyskum lánsbrøvum bert skattaður sambært lógina um rentu- og

fíggjarognaravgjald, t.v.s. við 1.9% p.a. av kursvirðinum á lánsbrævunum.

Landsstýrið vónar við hesum tógaruppskotunum, at tey verða við til at betra/tryggja gjaldføri landskassans framyvir.

1. viðgerð 22. mars 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 22. mars 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Lasse Klein, Jacob Lindenskov, Heini O. Heinesen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Ein minniluti (Jógvan Sundstein) tekur ikki undir við uppskotinum og setir eingi uppskot fram.

Ein annar minniluti (Finnbogi Arge) hevur hesar viðmerkingar:

Í sambandi við avtalurnar millum landsstýrið og ríkisstjórnina gjørdu donsku lánveitararnir greitt, at teir ikki framhaldandi vildu fíggja hallið hjá landskassanum.

Hóast hesa treyt valdi landsstýrið at smíða eina fíggjarlóg við halli. Boðað varð frá, at umframt skattatiltøk av ymiskum slag ætlaði Føroya Landsstýri at selja lánsbrøv til einstaklingar, virki og stovnar.

Fyri at tekkjast kapitalinum hevur landsstýrið valt at gera føroysku lánsbrøvini skattafrí. Tó verður fíggjarognaravgjald framvegis roknað av lánsbrøvunum.

Minnilutin stúrir fyri, at landsstýrið fer at áleggja stovnum og virkjum, sum eru undir landinum, at binda møguligt yvirskotsgjaldføri í nýggju lánsbrøvini, hóast trygdin í fløguni er sera ivingarsom, av tí at peningurin verður nýttur til alment forbrúk heldur enn til konsolidering av landskassanum.

Vandi er sostatt fyri, at almennur kapitalur, sum tað higartil ikki er eydnast landsstýrinum at fingið fatur á, á henda hátt verður søplaður hurtur til onga nyttu.

Minnilutin (Finnbogi Arge) tekur ikki undir við málinum og vísir loksins á, at landsstýrið við hesum uppskoti nýtir skattaskipanina til kappingaravlagandi virksemi, av tí at innistandandi aðrastaðni, eitt nú í peningastovnum og sparikössum, framvegis verður skattað við høgum rentuskatti umframt fíggjarognaravgjaldi.

2. viðgerð 15. apríl 1994. Uppskotið samtykt við 17-0 atkvøðum.

3. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 17-1 atkvøðum.

FL jnr. 2540-8/91.

Lóg nr. 65 frá 10. mai 1994.

158 Broyting í løgtingslóg um rentuskatt

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars 1994 legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um renttuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 5. juni 1992 um rentuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1 verður orðað soleiðis:
"Renta, sum føroyskir peningastovnar og postgiro geva av innistandandi peningi, herundir ábyrgdarpeningi í føroyskum sparikassum verður skattað eftir reglunum í hesi lóg."
2) § 5 verður strikað.
3) Í § 8, stk. 1 verður pkt. 2 strikað.

§ 2.

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om renteskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 af 5. juni 1992 om renteskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 1 affates således: "Rente, som færøske pengeinstitutter og postgiro yder af indskud, herunder garantiindskud i færøske sparekasser, beskattes efter reglerne i denne lov."
2) § 5 ophæves.
3) I § 8, stk. 1 ophæves pkt. 2.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Víst verður til løgtingsmál nr. 157/1993: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, har landsstýrið hevur gjørt felags viðmerkingar til broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt og broyting í løgtingslóg um rentuskatt.

1. viðgerð 22. mars 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 22. mars 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Lasse Klein. Jacob Lindenskov. Heini O. Heinesen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Ein minniluti (Jógvan Sundstein) vísir til viðmerkingarnar í máli nr. 157/1993: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Ein annar minniluti (Finnbogi Arge) tekur ikki undir við uppskotinum og vísir til viðmerkingar sínar í løgtingsmáli nr. 157/1993: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

2. viðgerð 15. apríl 1994. Uppskotið samtykt við 17-1 atkvøðum.

3. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

FL jnr. 2540-8/91.

Lóg nr. 62 frá 10. mai 1994.

159 Broyting í løgtingslóg um ferðagjald

Ár 1994, friggjadagin 18. mars legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðagjald.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 37 frá 26. mai 1988 við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, stk. 1 verður "300 kr." broytt til "120 kr."
2) Í § 1 verður sum nýtt stk. 3 sett:
"**Stk. 3.** Ferðaavgjald, ið er innkravt í einum mánaði, skal verða goldið Toll- og Skattstovu Føroya í seinasta

lagtingslov om ændring i lagtingslov om rejseafgift.

§ 1.

I lagtingslov nr. 37 af 26. maj 1988 med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 1, stk. 1 ændres "300 kr." til "120 kr."
2) I § 1 indsættes som nyt stk. 3:
"**Stk. 3.** Rejseafgift, der er indkrævet i løbet af en måned, skal indbetales til Toll- og Skattstovu Føroya

lagi 22. í øðrum mánaðinum eftir. Flutningsfyritøkan skal í seinasta lagi 10. í øðrum mánaðinum eftir senda Toll- og Skattstovu Føroya uppgerð yvir flutt ferðafólk avvarðandi mánað."

3) Í § 1 verður sum nýtt stk. 4 sett:
"**Stk. 4.** Verður avgjaldið ikki goldið til tíðina, skal 1.5% gjaldast í mánaðarligari rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjalddegnum at rokna."

4) Í § 1 verður sum nýtt stk. 5 sett:
"**Stk. 5.** Ferðaavgjald og renta, ið eru fallin til gjaldingar, kunnu verða innheintað við panting. Føroya Gjaldstova fremur panting fyri gjøld og rentur, ið eru fallin til gjaldingar eftir hesi lóg."

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. apríl 1994, og hevur gildi fyri ferðaseðlar, ið verða goldnir eftir at lógin er sett í gildi.
Stk. 2. Avgjald, ið flutningsfeløg hava kravt, men ikki avroknað, tá ið lógin fær gildi, fellur til gjaldingar eftir reglunum í § 1, stk. 3.

senest den 22. i den anden måned efter. Transportfirmaer skal senest 10. i anden måned efter sende Toll- og Skattstovu Føroya en opgørelse over antal transporterede passagerer for pågældende måned."

3) I § 1 indsættes som nyt stk. 4:
"**Stk. 4.** Er afgiften ikke indbetalt til den fastsatte tid, påløber der en månedlig rente på 1.5% for hver påbegyndt måned, fra forfaldsdagen at regne."

4) I § 1 indsættes som nyt stk. 5:
"**Stk. 5.** Rejseafgift og rente, der er forfaldet til betaling, kan være indkrævet ved pant. Føroya Gjaldstova foretager pantning for forfalden gæld og rente efter denne lov."

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. april 1994, og har virkning for billetter, der reserveres efter at loven er sat i kraft.
Stk. 2. Afgift, der er opkrævet, men ikke afregnet når loven træder i kraft, forfalder til betaling efter reglerne i § 1, stk. 3.

Viðmerkingar:

Ferðagjaldið í Føroyum er í løtuni 300 kr., og er sostatt eitt tað hægsta í heiminum - um ikki tað hægsta. Inntøkurnar av ferðagjaldinum vóru í 1993 11,8 mió. kr., men havast má í huga, at ferðagjaldið tann 29. mai var hækkað úr 200 upp í 300 kr.

Ferðagjaldið í londunum kring okkum er hetta:

Noreg: 0 kr.
Skotland: 0 kr.
Finland: 0 kr.
Grønland: 0 kr.
Svøríki: 12 kr.
Írland: 49 kr.
Danmark: 65 kr.
Ísland: 120 kr.

Landsstýrið hevur viðgjørt hetta mál av nyggjum, og hevur vent sær til Ferðaráðið, og biðið tað gjørt sínar viðmerkingar til tað høga ferðagjaldið, ið galdandi er.

Mett verður, at ferðaavgjaldið er ein forðing fyri munandi menning av ferðavinnuni í Føroyum, tí tað avlagar kappingartørið mótvegis grannalondunum, sum hava havt stóran vøkstur í ferðavinnuídnaðinum seinastu árini.

Lækking av ferðaavgjaldinum ber í sær, at Føroyar gerast betur kappingarførar við grannalondini, samstundis sum hetta eisini hevði verið eitt greitt signal til ferðastovur og túroperatørar kring heimin um, at vit í Føroyum verunliga taka ferðavinnuspurningin í álvara.

Ferðaráðið vísir í hesum sambandi serliga á tey mongu tiltøk, sum ferðavinnan í næstum væntandi fer at seta í gongd. Samstarv hesum viðvíkjandi er longu skipað í Suðuroy, Tórshavn, Vágum og norðoyggjum, og væntandi fylgir Eysturoyggin skjótt við. Hetta ber í sær, saman við øðrum tiltøkum, sum Ferðaráðið skipar fyri, at ferðavinnan væntandi fer at kasta enn meira av sær - eisini til landskassan.

Herumframt eru uppskot til broytingar, sum eru tilætlaðar at skapa neyvari reglur fyri innkrevjingini av ferðaavgjaldinum.

Skotið verður upp, at flutningsfyritøkurnar og umboðsfólk teirra, ið krevja upp ferðagjald frá ferðafólki, skulu hava skyldu til at avrokna uppkravdu gjøldini fyri hvønn mánað í seinasta lagi 22. í øðrum mánaðinum eftir at gjøldini eru uppkravd. Verður avroknингartíðarskeiðið ikki hildið, verður kravd renta uppá 1.5% pr. mánað frá og við gjaldsdegnum at rokna.

Skotið verður upp, at tey gjøld, sum eru kravd men ikki avroknað, tá lógin kemur í gildi 1. apríl, falla til gjaldingar eftir somu reglum sum omanfyri nevnt.

1. viðgerð 22. mars 1994. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 15. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 22. mars 1994 beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen, Karl Heri Joensen, Flemming Mikkelsen og Tordur J. Niclasen) tekur undir við uppskotinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Aulinn Kallsberg) førir fram:
Tað er at gleðast um, at landsstýrið og samgongan í hesi viðmerkingini til hetta mál ásanna, at hækkað gjøld ikki geva meira í inntøku til landskassan av teirri orsøk, at hækkað kostnaðarstøði, heilt einfalt, beinir fyri vinnuni.

Minnilutin heldur tí, at rættast er at taka stigið fult út og siga, at vit avtaka alt ferðagjaldið soleiðis, at vit fáa enn fleiri ferðafólk til landið, og tann mista inntøkan av ferðagjøldum kemur tá aftur sum økt inntøka frá ferðavinnuni við fleiri arbeiðsplássum sum tylgju.

Minnilutin setir tí í staðin fyri uppskot landsstýrisins fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðaavgjald.

§ 1.
Løgtingslóg nr. 37 frá 26. mai 1988 við seinni broytingum verður sett úr gildi.

§ 2.
Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om rejseafgift.

§ 1.
Lagtingslov nr. 37 af 26. maj 1988 med senere ændringer udgår.

§ 2.
Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

2. viðgerð 21. apríl 1994. Minnilutauppskotið fall við 8-0 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins samtykt við 25-0 atkvøðum.

3. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

Lóg nr. 56 frá 5. mai 1994.

160 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum

Ár 1994, friggjadagin 18. mars legði Finnbogi Isakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 175 frá 18. desember 1992 um skrásetingargjald á motorakførum v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 16 verður sum nýtt stk. 1 sett:
"Landsstýrinum verður heimilað at áseta serligar reglur um fritøku at gjalda skrásetingargjald sambært hesi lóg, tá motorakfør verða uppbygd aftaná ferðsluskaða, slit, tering v.m."

2) Aftaná § 23 verður sum nýggj § 23 a sett:
"**§ 23 a.** Landsstýrið setir eina nevnd við 3 limum. Av limunum skal 1 vera lógarkønur, 1 skal vera tekniskt kønur og 1 skal vera starvsgreinakønur og verður hesin útnevndur eftir innstilling frá felagnum fyri bilhandlarar og verkstaðseigarar.
Stk. 2. Nevndin hevur endaligu fyrisitingarligu avgerð í:
1) spurningum um akfør aftaná umbygging ella umvæling ikki er samlíkt við akfar, ið áður er avgjaldskravt, so at akfarið kemur undir avgjaldsskyldu eftir hesi lóg,
2) spurningum um krøvini fyri avgjaldsfrítøku eru lokin eftir teim reglum, ið landsstýrið

lagtingslov om ændring i lagtingslov om registreringsafgift af motorkøretøjer m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 175 af 18. december 1992 om registreringsafgift af motorkøretøjer m.v. foretages følgende ændringer:

1) I § 16 indsættes som nyt stk. 1:
"Landsstyret bemyndiges til at fastsætte særlige regler om fritagelse til at erlægge registreringsafgift i henhold til denne lov, når motorkøretøjer repareres efter beskadigelse i færdselen, slid, tæring m.v."

2) Efter § 23 indsættes som ny § 23 a:
"**§ 23 a.** Landsstyret nedsætter et nævn bestående af 3 medlemmer. Af medlemmerne skal 1 være lovkyndig, 1 være teknisk kyndig og 1 skal være branchekyndig og udnævnes denne efter indstilling fra foreningen for bilforhandlere og værkstedsejere.
Stk. 2. Nævnet har den endelige administrative afgørelse om:
1) spørgsmål om hvorvidt et køretøj efter reparation eller ombygning ikke kan betragtes som identisk med et tidligere afgiftsberigtiget køretøj, således at køretøjet skal afgiftsberigtiges efter denne lov,
2) spørgsmål om, hvorvidt kravene til afgiftsfri reparation eller ombygning af køretøjer er opfyldt

ásetur eftir § 16, stk. 1.

Stk. 3. Nevndin skal, tá hon verður biðin um tað, geva ummæli í spurningum, sum Toll- og Skattstovan leggur fyri nevndina.

Stk. 4. Landsstýrið ásetur starvsskipan fyri nevndina og ásetur reglur fyri kunning av avgerðum frá nevndini."

efter de regler, som landsstyret fastsætter i medfør af § 16, stk. 1.

Stk. 3. Nævnet skal endvidere på begæring afgive erklæring til Toll- og Skatstovan i spørgsmål, som dette forelægger nævnet.

Stk. 4. Landsstyret fastsætter forretningsorden for nævnet samt regler om bekendtgørelse af afgørelse, der træffes af nævnet."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins um broyting í løgtingslóg nr. 175 frá 18. desember 1992 um skrásetingargjald á motorakførum er uppskot um at broyta § 16 í lógini um heimild landsstýrisins til at seta út kunngerð um skrásetingargjald, tá akfar verður umbygt aftaná ferðsluskaða, slit, tering v.m.

Broytingin hevur tilknýti til tilevnað uppskot til kunngerð um hesi viðurskifti, sum nágreiniliga lýsir m.a. nær akfar er so mikið lítið broytt í samband við umbygging, at talan kann sigast at vera um sama akfar, sum frammanundan umbyggingini.

Broytingin hevur tó ikki stórvegis innihaldsliga broyting, tá heimild fyriliggur frammanundan, meðan hetta er ein teknisk umorðing.

Í umsitingini av lógini um skrásetingargjald kann vera torført at savna tann fakkunnleika, ið neyðugur er, fyri at lógin kann umsitast á besta hátt. Landsstýrið metir tað neyðugt, at umsitingin til hjálp í spurningum, sum krevja eitt nú tekniskan kunnleika, skal hava møguleika at útvega sær hjálp frá fólki, sum kenna til teknisku síðuna av spurminginum um skráseting av akførum. Skotið verður upp, at nevnd verður sett, sum m.a. hevur serkunnleika at meta um teir teknisku trupulleikar, ið kunnu vera vera í málum um skrásetingargjald, eitt nú tá umsitingin skal taka avgerð um, hvørt talan er um uppruna skrásett akfar, ella talan er um annað akfar, og annars at geva serkøna vegleiðing til umsitingina.

Nevndin skal mannast við fólki, sum hevur lógarkunnleika, tekniskan kunnleika og vinnugreinakunnleika (branchekunnleika), og fær felagið fyri bilhandlarar og verkstaðseigarar í hesum sambandi møguleika fyri at gera innstilling til landsstýrið um val av einum limi.

1. viðgerð 22. mars 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 26. apríl 1994 legði fram soljóðandi

F e l a g s á l i t

Sí felagsálit í løgtingsmáli nr. 73/1993: Broyting í løgtingslóg um skráseingargjald av motorakførum v.m.

2. viðgerð 27. apríl 1994. Uppskotið samtykt við 26-0 atkvøðum.

3. viðgerð 28. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

Lóg nr. 68 frá 10. mai 1994.

161 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars løgdu Svend Aage Ellefsen og John Petersen, løgtingsmenn, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

Í § 33 verður sum nýtt nr. 13 sett:
"Hjá persóni, sum hevur lønarinntøku, herundir fiski- og útróðrarpart og sjálvstøðugt vinnurekandi, neyðugar útreiðslur í sambandi við ferðing millum bústað og arbeiðsstað eftir reglunum í litra a - c.

a) Útreiðslur til ferðing við bili millum bústað og arbeiðsstað verða loyvdar frádrignar við ávísari upphædd fyri hvønn koyrdan kilometur.
b) Kann almenn ferðsla verða nýtt í

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

I § 33 indsættes som nyt nr. 13:
"Hos person, der har lønindtægt, herunder fiskeri- eller hjemmefiskeripart og selvstændige erhvervsdrivende, nødvendige udgifter i forbindelse med rejse mellem bopæl og arbejdsplads i henhold til reglerne i litra a - c.

a) Udgifter til rejser med bil mellem bopæl og arbejdsplads tillades fradraget med bestemt beløb for hver kørt kilometer.

staðin, verður frádráttur loyvdur ájavnt við ferðakostnaðin við almenna ferðasambandinum.

c) Fyri ferðing millum bústað og arbeiðsstað sjóvegis verður frádráttur loyvdur ájavnt við útreiðslur, men tó ongantíð meira enn svarandi til ferðakostnaðin við almennum ferðasambandi. Útreiðslurnar sambært reglunum í litra a - c verða tó bert loyvdar frádrignar í tann mun, samanlagda upphæddin fer upp um eina ávísa upphædd, ið Toll- og Skattstovan ásetir."

§ 2.

Henda lóg fer gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Frádrátturin í hesi lóg verður galdandi frá og við inntøkuárinum 1993.

b) Såfremt der gøres brug af offentlig trafik, tillades fradrag i samme omfang, som prisen er for den offentlige trafik.

c) For rejse søvejs mellem bopæl og arbejdsplads tillades fradrag, der svarer til udgifterne, men aldrig mere end prisen med offentlig trafik. Udgifterne i henhold til reglerne i litra a - c kan dog kun fradrages i det omfang, det samlede beløb overstiger et bestemt beløb, der fastsættes af Toll- og Skattstovan.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Stk. 2. Fradraget i denne lov gælder fra og med indtægtsåret 1993.

Viðmerkingar

Undanfarna samgonga millum fólkaflokkin og javnaðarflokkin gjørdi ávísar tillagingar í skattalógini móti eini bruttoskattaskipan.

Hóast ivingarsamt var, hvørt neyðugar flutningsútreiðslur millum heim og arbeiðspláss kundu loyvast frádrignar, áðrenn bruttoskatturin varð útroknaður, so samtykt løgtingið, at einasta útreiðsla, ið kundi loyvast frádrigin frameftir í sambandi við arbeiði, skuldi verða útreiðsla til dupult húsarhald.

Men undirritaðu meta ikki vera rætt við loyvdum ella ikki loyvdum skattafrádráttum at tvinga fólk at leiga sær býli heiman frá heldur enn at brúka sama pening til flutning, og tá kunnu búgva saman við restini av familjuni í heiminum.

Tí verður skotið upp at broyta skattalógina soleiðis, at vanligur ferðakostnaður til arbeiðis verður loyvdur frádráttur í sjálvuppgávuni, áðrenn skattskylduga inntøkan verður útroknað.

Ikki minst við atliti til, at livikostnaðurin og skattatrýstið hjá vanliga skattgjaldaranum er so nógv broytt til tað verra, síðan nýggja landsstýrið tók yvir, verður fyriliggjandi uppskotið sett fram.

Serstakliga broytingarnar í skattastiganum, tær av landsstýrinum kravdu hækkingarnar í kommunuskattinum, lyftingin av sjálvum skattaloftinum og hækkingin í meirvirðisgjaldinum upp í 25% gera tað óliviligt í landinum.

Men eisini hetta, at landsstýrissamgongan hevur avrátt at hækka ferðagjaldið eftir sjógvi og landi, ger tað neyðugt aftur at loyva feraðfrádráttinum.

Skotið verður upp at loyva frádrátt, líkamikið um ferðast verður til og frá við egnum bili ella við almennum ferðasambandi, men hinvegin kann loyvdi frádrátturin ongantíð fara upp um kostnaðin, um ferðast verður við tí almenna.

Vit halda verða rímiligt, at ásett verður mark fyri, hvussu lítil kostnaður skal loyvast frádrigin, og verður tí skotið upp at geva Toll- og Skattstovuni heimild at áseta slíkt mark.

Av tí at skotið verður upp, at frádrátturin skal loyvast fyri skattaárið 1993, verður heitt á løgtingið at viðgera uppskotið sum skjótast. Tí Toll- og Skattstovan má hava neyðuga tíð at søkja sær upplýsingar og ájourføra sjálvuppgávurnar, áðrenn hesar verða endaliga álíknaðar.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 26. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av løgtingsmonnunum Svend Aage Ellefsen og John Petersen tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og vísir til løgtingsmál nr. 65/1993.

2. viðgerð 28. apríl 1994. Málið varð afturtikið.

162 Óbroytt ferðagjøld við Strandferðsluni

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars løgdu Svend Aage Ellefsen og John Petersen, løgtingsmenn, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum ikki at hækka ferðagjøldini við strandfaraskipunum og almennu bussunum í ár.

Viðmerkingar

Síðani nýggja landsstýrið millum javnaðarflokkin, tjóðveldisflokkin og sjálvstýrisflokkin varð

skipað, er livikostnaðurin í føroyska samfelagnum hækkaður út av lagi.

Skattastigin er broyttur, so flestu inntøkurnar nú bera hægri landsskatt, álagt er flestu kommunum at hækka kommunaskattin og sjálvt skattaloftið er lyft, so vanligi løntakarin er við skerdan lutin, meðan hitt almenna fer avstað við større helvtini, tá lønin verður útgoldin.

Umframt at hækka rentuskattin, seta í gildi fíggjarogn- og onnur avgjøld varð meirvirðisgjaldið hækkað úr 23% í 25%, og ikki minst hetta seinna kennist nívandi, tá vanligu húsarhaldsvørurnar skulu keypast inn.

Oman á ætlar landsstýrið at hækka gjøldini við strandferðsluni.

Tey, sum hava Strandferðsluna mest fyri neyðini, eru nú cinaferð bygda- heldur enn býarfólk.

Hækkingar í ferðakostnaðinum fara at kennast sum steinar oman á byrðu hjá teimum, sum búleikast á bygd.

Frammanundan hevur vinnulívspolitikkurin hjá samgongumi við móðurfelagið og stongsli av fiskavirkjum bæði her og har, rakt fleiri av bygdunum í ógvusligan mun. At allar almennar fløgur og tey arbeiðsplássini, ið vóru í tí sambandinum eru burtur, ger tað uppaftur óliviligari nógvastaðni.

Við atliti til hesi viðurskiftum og tí, at hækkaður ferðaseðlaprísur fer at minka um ferðafólkatalið og sostatt ikki geva meirinntøku, verður skotið upp at áleggja landsstýrinum ikki at seta ferðakostnaðin upp í ár.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í samferðslunevndina, sum 28. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av John Petersen og Svend Aage Ellefsen, løgtingsmonnum, tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1994 beint í samferðslunevndina.

Samferðslunevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt fund við Signar á Brúnni, landsstýrismann, um prishækkingarnr hjá Strandfaraskipum Landsins og Bygdaleiðum. Landsstýrismaðurin upplýsti, at landsstýrið í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina fyri 1994 hevði fráboðað hækkingar í ferðaseðlakostnaðinum.

Í sambandi við viðgerðina hevur nevndin fingið avrit av samtyktu hækkingunum, sum landsstýrið hevur samtykt.

Í sambandi við hesa viðgerð hevur samferðslunevndin kannað tilfarið í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina og viðmerkingar hjá fíggjarnevndini í sambandi við fráboðan um hækking av ferðaseðlakostnaðinum.

Ongar viðmerkingar eru at finna um hækkingar í ferðaseðlakostnaðinum frá fíggjarnevndini. Í mun til uppskot landsstýrisins til fíggjarlóg fyri 1994 mælir fíggjarnevndin tinginum til at

lækka uppphæddina til Strandfaraskip Landsins við 1 mió. kr. og at seta upphæddina til 37 mió. kr. (sí bls. 6.35 í fylgiskjølunum til fíggjarlóganuppskotið fyri 1994).

Kortini er eitt fylgiskjal at finna í skjølunum, sum hvørki hevur navn ella dagfesting á breddanum. Fylgiskjalið er eitt skjal frá landsstýrinum, sum kemur fíggjarnevndini í hendi undir viðgerðini av uppskotinum til fíggjarlóg fyri 1994. Á bls. 2 í fylgiskjalinum mælir landsstýrið nú til, at upphæddin til Strandfaraskip Landsins verður sett til 36 mió. kr. við hesi viðmerking: "Ætlanin er m.a. at hækka ferðaseðlakostnaðin nakað". Men fíggjarnevndin er ikki samd við landsstýrinum, og í mun til uppskotið hjá landsstýrinum mælir fíggjarnevndin til at hækka upphæddina til Strandfaraskip Landsins við 1 mió. kr. og at seta upphæddina til 37 mió. kr.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minniluta.

Meirilutin (Lasse Klein, Jógvan A. Johannessen, Terje Davidsen, Svend Aage Ellefsen og John Petersen) er samtørdur um, at fíggjarnevndin alla tíðina hevur verið av teirri áskoðan, at Strandfaraskip Landsins skuldi spara 1 mió. kr. í mun til upprunauppskot landsstýrisins, og at tingið hevur verið av somu áskoðan, og at ongar príshækkingar skuldu gerast í takstinum hjá stovninum. Hetta nóast eitt uppskot um óbroyttar prísir verður tagt fram millum 2. og 3. viðgerð. Hetta uppskot varð ikki samtykt m.a. av teirri orsøk, at fleiri tingmenn vóru samtørdir um, at hædd var tikin fyri hesum í mun til "fylgiskjal" landsstýrisins.

Í fylgiskjalinum til fíggjarlógina fyri 1994 stendur á síðu 6.1 bræv frá stjóranum fyri Strandfaraskip Landsins, dagfest 27. juli 1993 um útreiðslustøðið hjá stovninum: "Arbeitt verður við skynsemisbroytingum innan allar deildir, og tí verður roknað við, at vit kunnu lækka útreiðslurnar so at siga alla staðni fyri 1994 í mun til 1993."

Meirilutin metir, at hetta er høvuðsorsøkin til, at fíggjarnevndin mælir til at lækka uppskot landsstýrisins við 1 mió. kr., tí heldur ikki í viðmerkingunum í sama bræv um inntøkurnar hjá stovninum er nevnt við einum orði, at príshækkingar skuldu fara fram.

Meirilutin metir tað ikki sambæriligt við støðuna í landinum at loyva príshækking hjá almennum stovnum yvirhøvur, serstakliga tá hugsað verður um lógina um prís og lønarsteðg, men tekur undir við lækkingum á ferðaseðlakostnaðinum, um hetta verður gjørligt.

Meirilutin heldur ikki, at tað moralskt kann góðtakast, at tað júst er tað almenna, sum gongur á odda við príshækkingum, og at príshækkingar í sínt heild hjá almennum stovnum eru ímóti ynskinum hjá einum meiriluta á Føroya Løgtingi.

Hetta er eisini orsøkin til, at ein meiriluti mælir til í staðin fyri uppskotið hjá teimum báðum tingmonnum at seta fram soljóðandi

U p p s k ot

til

samtykt

Føroya Løgting áleggur landsstýrinum beinanvegin at lækka prísirnar hjá Strandfaraskipum Landsins og Bygdaleiðum til tað, teir vóru frammanundan, men tekur annars undir við lækkingum, um hetta er gjørligt.

Ein minniluti (Hans Tausen Olsen) gev vart við, at tá ið fíggjarlógaruppskotið fyri 1994 varð lagt fram av landsstýrinum, varð boðað frá, at neyðugt var hjá Strandferðsluni at hækka ferðaseðlakostnaðin umframt at spara, um javnvág skuldi verða í rakstrinumm.

Játtanin til Strandferðsluna varð sett til 37 mió. kr.

Uppskotsstillararnir til framlagda uppskotið mæla til, at ferðaseðlakostnaðurin verður ikki hækkaður. Verður uppskotið sett í verk, er tað greitt, at rokanskapurin hjá Strandferðsluni fer ikki at javnviga - talan verður um eitt størri hall.

Út frá tí, ið her er sagt frá, setir minnilutin (Hans Tausen Olsen) einki uppskot fram, men vísir til støðu sína í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 1994.

Ein annar minniluti (Heini Johansen) tekur støðu í tingsalinum, men er annars samdur við høvuðsinnihaldinum í viðmerkingunum.

2. viðgerð 4. mai 1994. Atkvøðugreiðslan útsett.

Atkvøðugreiðslan 11. mai 1994, uppskotið frá meirilutanum í samferðslunevndini fall við 14-0 atkvøðum.

163 Fíggingargrunnur fyri alivinnuna

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Niels Pauli Danielsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at kanna møguleikarnar fyri at útvega fígging til alivinnuna og seta ein grunn á stovn, sum kann verða við til at varðveita og økja munandi um talið á arbeiðsplássum í alivinnuni.

Viðmerkingar

Tey seinastu árini er fjórðingurin av útflutningsvirðinum í Føroyum komin úr alivinnuni. Nøgdin hevur ligið um 16.000 tons trý tey seinastu árini til eitt virði av 480 til 550 mió. kr. hvørt ár.

Í Noregi verður mett, at 10 tons av alifiski geva eitt arbeiðsplass.

Rokna vit við einum arbeiðsplássi fyri hvørji 15 tons, so hava tey seinstu árini verið yvir 1000 fólk í starvi beinleiðis og óbeinleiðis í alivinnuni hvørt árið.

Hesi arbeiðspláss noyðast vit í hesum arbeiðsloysistíðum at gera, hvat ið vit kunnu fyri at varðveita og økja um. Tí møguleikar eru í alivinnuni fyri uppaftur fleiri arbeiðsplássum.

Verður hugt eftir nettotjóðarúrtøkuni, sæst, at alivinnan gevur føroyska samfelagnum líka nógv sum øll fiskivinnan undir Føroyum, t.e. ísfiskaskip, útróðrarbátar og flakavirki.

Men alivinnan er fíggjarkrevjandi, og trupult hevur alla tíðina verið at útvega vinnuni fígging. Nógv alibrúk hava liðið rentudeyðan og eru steðgað, og verður einki gjørt fyri lagaligari fígging til alivinnuna, er stórur vandi fyri, at hon fær eitt afturstig.

Í fjør legði Kristiligi fólkaflokkurin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokkur uppskot fram á løgting um fløgustuðul til alivinnuna 5 kr. fyri smoltið.

Tikið varð undir við hesum hugskoti, sum bjargaði útsetingini av smoltinum.

Samtykt var lóg, sum heimilar landsstýrinum at veita 5 kr. í fløgustuðli fyri smoltið í 3 ár.

Men tað harmiliga er, at landsstýrissamgongan á fíggjarlógini fyri 1994 longu hevur ætlanir um at minka upphæddina og setti 15 mió. kr. av móti teimum 25 mió. kr., sum landsstýrið heldur vera neyðugt, um galdandi lóg skal verða fylgd.

Eingin kann reka nakað virkalív við tílíkum støðugum broytingum í hvørjum andarhaldi. Eingin vil fíggja, tí at eingin veit, hvussu lógin verður broytt seinni í árinum.

Neyðugt er við tryggari fígging, sum ein fíggingargrunnur kann veita, og peningur í ein sovorðnan fíggjargrunn verður neyðugt at taka upp samráðingar við danir um. Teir hava fyrr hjálpt føroyska vinnulívinum í gongd, t.d. við 60 miljóna grunninum, men enn er eingin gongd komin á hesu ferð, sum kann gera okkum førar fyri at vinna á kreppuni, sjálvt um nógvar miljardir eru lættar úr Danmark. Bankarnir og landskassin hava havt nóg mikið við at hjálpt sær sjálvum.

Tað er neyðugt við nýggjum peningainspræningum í føroyska samfelagið, og nú má vinnulívið eiga tørn, um minkað skal verða um arbeiðsloysið og borturtlytingina.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í ídnaðarnevndina, sum 22. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð tann 23. mars 1994 beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og setir einki uppskot fram.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið fall við 1-0 atkvøðu.

164 Avtøka av MVG (meirvirðisgjaldi) á neyðsynjarvørum

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Niels Pauli Danielsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.

§ 1.
Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992

lagtingslov om ændring i lagtingslov om meromsætningsafgift.

§ 1.
I lagtingslov nr. 136 af 8. september 1992

um meirvirðisgjald við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:
Í § 2, stk. 3, verður sett sum nýtt litra "o": "Neyðsynjarvørur til matna, klædna og bústað."

§ 2.
Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

om meromsætningsafgift med senere ændringer foretages følgende ændring:
I § 2, stk. 3, indsættes som ny litra "o": "Livsnødvendige ting som mad, beklædning og bosted."

§ 2.
Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar

Síðan lógin um meirvirðisgjald kom í gildi fyri einum góðum ári síðan, hevur tað bara verið sera trupult hjá føroysku húsarhaldunum at klára seg.

Tað sama kann verða sagt um heimaídnaðin, sum at kalla er steðgaður fullkomiliga upp. Gamlar fyritøkur eru farnar av knóranum, sum eingin droymdi um, kundi henda. Serliga hart tykjast hakaravirki og onnur virki vera, sum fáast við at útvega fólki tað, sum neyðugt er til lívsins uppihald.

Hetta kann ongantíð hava verið ætlanin við lógini um meirvirðisgjald, at hon skuldi beina fyri øllum heimaídnaði í Føroyum og gera tað uppaftur truplari hjá t.d. barnarikum familjum. Lógin um barnastyrk er sett úr gildi, og barnafrádráttin í skatti hevur landsstýrið skotið upp at hækka við einum 100 króna seðli, tá ið meirvirðisgjaldið varð hækkað úr 23 til 25%, sum er tað hægsta í øllum heiminum.

Eitt er at fara undir eina meirvirðisgjaldsskipan, men so skuldi punktgjald á vanligum vørum og onnur gjøld verið avtikin, og neyðsynjarvørur áttu allar at sloppið undan meirvirðisgjaldi, um ætlanin ikki er at gera støðuna hjá teimum uppaftur verri, sum ringast eru fyri í samfelagnum og orka minst. Ein kann ikki samtíðis hava høgan nýtsluskatt og høgan beinleiðis skatt og avgjøld í hópatali.

Tí verður hetta uppskot um broyting í lógini um meirvirðisgjald sett fram á tingi.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Felagsálit

í

løgtingsmáli nr. 164/1993: Avtøka av MVG (meirvirðisgjaldi) á neyðsynjarvørum,
nr. 166/93: Avtøka av MVG (meirvirðisgjaldi) á sjómansheimum og hotellum/matstovum, sum ikki hava skeinkiloyvi
og nr. 170/93: Broytingar í meirvirðisgjaldsskipanini.

Málini nr. 164 og 166 eru løgd fram av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og

fiskivinnuflokki og nr. 170 av Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1994 beind í skattanevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Lasse Klein, Heine O. Heinesen og Jacob Lindenskov) tekur ikki undir við málunum og setir einki uppskot fram.

Ein minniluti (Jógvan Sundstein) vísir annars til viðmerkingar í løgtingsmáli nr. 172/93: Broyting í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju.

Ein annar minniluti (Finnbogi Arge) heldur tað vera rætt at lækka meirvirðisgjaldssatsin á neyðsynjarvørum, men heldur ikki, at tað er forsvarligt at fara so langt, sum uppskotsstillarin mælir til. Minnilutin setir tí fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at leggja fram lógaruppskot, sum differentierar meirvirðisgjaldið soleiðis, at %-gjaldið á neyðsynjarvørum og heilivági verður sett til 12%.

2. viðgerð 22. apríl 1994. Upprunauppskotið fall við 1-0 atkvøðu. Uppskotið frá minnilutanum í skattanevndini fall við 7-0 atkvøðum.

165 Broytingar í forsorgarlógini

Ár 1994, friggjadagin 18. mars legði Niels Pauli Danielsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at taka upp samráðingar við donsku stjórnina um, at fólk í neyð fær ta somu hjálp í Føroyum, sum føroyingar fáa í Danmark, annaðhvørt

gjøgnum arbeiðsloysisskipanina ella forsorgarlógina, so at eingin av teimum ávum er noyddur at flyta úr Føroyum til Danmarkar.

Viðmerkingar

Tá ið fólkaflokkurin og javnaðarflokkurin í landsstýrinum løgdu fram og á vári 1992 fingu samtykt uppskot í løgtinginum um arbeiðsloysisgrunn og arbeiðsávísing, samtyktu teir um somu tíð broytingar í forsorgarlógini, sum gera, at føroyingar, sum koma í neyð vegna arbeiðsloysi, fáa væl minni enn bæði, hvat ið danir fáa og føroyingar fingu frammanundan. Endamálið við hesum var at fáa so nógv sum møguligt yvir á arbeiðsloysisskipanina og harvið yvir á tað føroyska vinnulívið og løntakaran, ið bera útreiðslurnar av arbeiðsloysisskipanini.

Stuðulin til arbeiðsleys var til 1. august 1992, tá ið arbeiðsloysisskipanin fór at virka, latin gjøgnum forsorgarlógina, har tey fingu hjálp, sum komin vóru í eyð vegna arbeiðsloysi. Tey fingu meira enn tað, nógv teirra nakrantíð hava fingið frá arbeiðsloysisskipanini, og tað var skattafrítt, sum øll onnur neyðhjálp.

Útreiðslur á forsorgarlógini rinda danir við 40%.

Í 1991 vórðu goldnar til arbeiðsleys 46,6 mió. kr. eftir forsorgarlógini.

Í 1992 fram til 1. september vórðu goldnar 45,6 mió. kr. til arbeiðsleys. Danir rindaðu sostatt góðar 18 mió. kr. av hesum útreiðslunum, takað gjøgnum heildarveitingina (15%) og restina gjøgnum almannaveitingarnar, t.e. 25% av samlaðu útreiðslunum.

Við at flyta nógv tann størsta partin av stuðulinum fyri arbeiðsloysi frá forsorgarlógini yvir á arbeiðsloysisskipanina, sum gjørt 1. august 1992, spardi landsstýrissamgongan dønum fyri 12 mió. kr. eftir tølunum frá 1991 og 1992, sum føroyski løntakarin og arbeiðsgevarin komu at gjalda í staðin. Høvdu tey, sum komu í neyð vegna arbeiðsloysi, verðið verandi á forsorgarlógini undir lands- og ríkiskassanum, so hevði støðan hjá arbeiðsloysisskipanini í dag verið ein onnur.

Tann, sum nú noyðist á forsorgarlógina, tí at einki meir fæst frá arbeiðsloysisskipanini, fær tað sama sum grunduppheddina hjá fólkapensjónisti.

Soleiðis er í Føroyum, men soleiðis er ikki í Danmørk. Tí er tað lítið at siga til, at nógvir føroyingar velja at flyta til Danmarkar og koma í danskan arbeiðsloysiskassa ella undir danska forsorg, har væl meira fæst enn í Føroyum.

Hesi viðurskifti skunda undir eina flyting úr Føroyum.

Tað er danska stjórnin neyvan so fegin um.

Tí tænir tað øllum pørtum, at samráðingar beinanvegin verða tiknar upp av nýggjum, sum mugu føra til, at fólk, sum koma í neyð vegna arbeiðsloysi í Føroyum, fáa ta somu hjálp, sum føroyingar fáa, ið flyta til Danmarkar.

Dømi eru um, at arbeiðsleys einki hava fingið hvørki frá arbeiðsloysisskipanini ella

almannastovuni í Føroyum, men fáa til lívsins uppihald í Danmørk, tá ið tey fluttu av landinum. Tað sigur frá, at lógin kanska verður umsitin strangari í Føroyum enn í Danmørk.

Tað er nógv, sum bendir á, at landsstýrið innan alt ov langa tíð álíkavæl noyðist at taka samráðingarnar upp aftur við donsku stjórnina um inntøkutrygdina hjá fiskimonnum og nýggj lán, sum onkur av landsstýrismonnunum longu hevur boðað frá.

Í nýggjum samráðingum eigur eisini at verða lagt upp til, at lands- og ríkiskassin gjalda til arbeiðsloysisskipanina, sum tað er í øðrum londum, og sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava biðið um.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 27. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya Framburðs- og fiskivinnuflokki tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1994 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og vísir á løgtingsmál nr. 192/1993: Løgtingslóg um ískoytisveiting til forsorgarstuðul vegna tørvandi arbeiði og serar einki uppskot fram.

2. viðgerð 28. apríl 1994. Uppskotið fall við 7-0 atkvøðum.

166 Avtøka av MVG (meirvirðisgjaldi) á sjómansheimum og hotellum/matstovum, sum ikki hava skeinkiloyvi

Ár 1994, friggjadagin 18. mars legði Niels Pauli Danielsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

Uppskot

til

løglingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.

§ 1.
Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald við seinni broytingum verður gjørd hendа broyting:
Í § 2, stk. 3, litra b, verður eftir "umlættingarheim" sett: "sjómansheim, hotel/-matstovur, sum ikki hava skeinkiloyvi."

§ 2.
Hendа lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om meromsætningsafgift.

§ 1.
I lagtingslov nr. 136 af 8. september 1992 om meromsætningsafgift med senere ændringer foretages følgende ændring:
I § 2, stk. 3, litra b, indsættes efter "plejehjem": "sømandshjem, hoteller/restauranter, der ikke har udskænkningstilladelse."

§ 2.
Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar

Tey føroysku sjómansheimini gera eitt dygdargott sosialt arbeiði, sum samfelag okkara illa fær verið fyri uttan. Síðan Tórshavnar Sjómansheim í 1923 læt upp, eru tey orðin inngrógvin í føroysku fólkasálina.

Til fyri stuttum var á fíggjarlógini hjá løgtinginum játtaður nýggjum sjómansheimum peningur við teirri grundgeving, at hesi gera eitt neyðugt sosialt arbeiði hæði millum sjófólk okkara og í býi og bygd, har tey eru.

Aðrir almennir stovnar av sama slagi eins væl og privatir, sum veita tað, lógin um meirvirðisgjald kallar "umsorgan og stuðul", eru undantiknir avgjaldsskyldu, hvat ið meirvirðisgjaldi viðvíkur.

Tí er tað ikki meira enn rímiligt, at sjómansheim eisini verða undantikin.

Tað eigur eisini at verða havt í huga, at sjómansheimini reka rúsdrekkafrítt hotel- og matstovuvirksemi.

Tá ið rúsdrekkalógin varð framløgd, segði Marita Petersen, núv. løgmaður, ið vegna landsstýrið legði uppskotið fram á tingi, at endamálið við lógini var at minka um rúsdrekkamisnýtsluna.

Tað má tí haldast at vera í samljóð við ynski landsstýrisins, at Føroya løgting gevur rúsdrekkafrium hotel- og matstovuvirksemi so góðar sømdir, sum til ber.

Undir viðgerðini av rúsdrekkalógini søgdu hotelstjórar við rættarnevnd løgtingsins og almenningin, at skeinkiloyvi vildi bøta avgerandi um rakstur teirra.

Henda 'vinningsbata" fáa sjómansheimini ikki og heldur ikki tey hotel og tær matstovur, sum ikki hava og heldur ikki vilja hava skeinkiloyvi.

Royndir og hagtøl kring knøttin allan kunnu ikki afturvísast, at fríari atgongd til rúsdrekka førir til størri nýtslu.

Skal ein minka um nýtsluna og harvið eisini misnýtsluna, má ein tí stuðla matstovum og gistingarhúsum, sum eru "rúsdrekkafrí".

Alt virksemi hevur tað trupult í tí melduródn, sum herjar land okkara í hesum tíðum. Sjómansheim eru einki undantak.

Eingin okkara veit, hvussu tá føroyska framtíðarsamfelagið fer at síggja út, men vit vita, hvønn ovurhonds stóran týdning, sjómansheimini hava havt og hava, kanska serliga í ringum tíðum.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Felagsálit

Sí felagsálit í løgtingsmáli nr. 164/93.

2. viðgerð 22. apríl 19944. Uppskotið fult við 1-0 atkvøðum.

167 Løgtingslóg um minstuløn til útróðrarmenn

Ár 1994, legði Heini O. Heinesen, løgtingsmaður, vegna fiskivinnunevndina fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um minstuløn til útróðrarmenn.

§ 1. Við tí endamáli at tryggja inntøkur útróðrarmanna verður landsstýrinum heimilað at útgjalda minstuløn til manning á fiskiførum á útróðri á føroysku landleiðini í eini tveir mánaða royndartíð frá 1. mars til 30. apríl 1994.

§ 2. Manning á fiskiførum á útróðri á føroysku landleiðini kann verða latin minstaløn til útróðrarmenn í eini 2 mánaða royndartíð í tíðarskeiðinum 1. mars tí 30. apríl 1994. Treytin fyri minstuløn til útróðrarmenn er, at fiskifarið hevur avreitt minst 10 ferðir seinastu 3 mánaðirnar, at manningin verður avroknað og í tali er sum vanligt er á staðnum, at øll veiða verður avreidd undir einum, og at fiskifarið avreiðir minst 25 kilo uppá mannin fyri hvønn veiðidag.

§ 3. Um manning á útróðrarfari skal koma undir skipanina við minstuløn fyri útróðrarmenn, skal bátsformaðurin fyri hvønn mánað lata Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna skrivliga fráboðan og lista yvir manning. Fráboðanin og listin yvir manningina skal vera Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna, undirskrivað av manning og bátsformanni, í hendi í seinasta lagi 1. dagin í mánaðanum ætlanin er at koma undir skipanina, tó fyrstu ferð í seinasta lagi tveir dagar eftir, at lógin er lýst.

§ 4. Minstalønin til útróðrarmenn er kr. 7.500,00 um mánaðin. Um minstaløn, fiskipartur og onnur inntøka hjá útróðrar-

lagtingslov om mindsteløn til hjemmefiskere.

§ 1. Med det formål at sikre hjemmefiskernes indtægter er Landsstyret bemyndiget til at udbetale mindsteløn til mandskab på fartøjer i hjemmefiskeri i færøsk fiskerizone i en prøveperiode på to måneder fra 1. marts til 30. april 1994.

§ 2. Til mandskab på fartøjer i hjemmefiskeri i færøsk fiskerizone kan yde mindsteløn for hjemmefiskeri i en 2 måneders prøveperiode i tidsrummet fra 1. marts til 30. april 1994. Betingelsen for udbetaling af mindsteløn til hjemmefiskere er, at fiskefartøjet har landet mindst 10 gange de sidste 2 måneder, at mandskabet bliver afregnet og i antal er som sædvane er på stedet, at fangsten bliver landet samlet, og at fiskefartøjet lander mindst 25 kilo pr. mand pr. dag.

§ 3. Hvis mandskabet på et hjemmefiskefartøj skal komme ind i ordningen med mindsteløn for hjemmefiskere, skal bådsformanden for hver måned sende Fiskernes Lønudligningsfond skriftlig tilmelding og liste over mandskabet. Tilmelding og liste over mandskabet skal være Fiskernes Lønudligningsfond i hænde, underskrevet af mandskab og bådsformand, senest den 1. i den måned i hvilken man agter sig under ordningen, dog første gang senest to dage efter, at loven er bekendtgjort.

§ 4. Mindstelønnen for hjemmefiskere er kr. 7.500,00 om måneden. Hvis hjemmefiskernes mindsteløn, fangstandel og anden

manni samanlagt fer upp um kr. 12.725,00 um mánaðin, útgoldið verður fyri, verður minstaløn minkað við sama krónutali, sum øll inntøkan fer upp um kr. 12.725,00.

§ 5. Um avloysari ella nýggjur maður kemur við á fiskifar fyri annan mann, fráboðar bátsformaðurin Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna hvørjar dagar, viðkomandi maður skal hava minstuløn fyri.

§ 6. Minstaløn til útróðrarmenn verður avroknað mánaðin eftir, at hon er vunnin.

§ 7. Útróðrarmenn velja sjálvir, um teir koma undir skipanina við minstuløn ella fáa minstaforvinning.

§ 8. Henda lóg fær gildi 1. mars 1994 og fer úr gildi aftur 30. apríl 1994.

indtægt sammenlagt overstiger kr. 12.725,00 i den måned, som der skal udbetales for, reduceres mindstelønnen med samme antal kroner som hele indtægten overstiger kr. 12.725,00.

§ 5. Om afløser eller ny mand kommer med på fiskefartøj for anden mand meddeler bådsformanden Fiskernes Lønudligningsfond, hvilke dage vedkommende mand skal have mindsteløn.

§ 6. Mindstelønnen til hjemmefiskere bliver afregnet måneden efter den er optjent.

§ 7. Hjemmefiskere vælger selv, om de kommer med i ordningen med mindsteløn eller får mindsteindtægt.

§ 8. Denne lov træder i kraft 1. marts 1994 og ophæves igen 30. april 1994.

Viðmerkingar

Løgtingið samtykkir við 3. viðgerð tann 4. mars 1994, við 27-0 atkvøðum løgtingsmál nr. 98/1993: Løgtingslóg um minstuløn til útróðrarmenn, við teimum broytingum, sum ein samd fiskivinnunevnd hevði mælt til. Ein teknisk villa í broytingaruppskotinum frá fiskivinnunevndini hevur ført við sær, at § 2 í lógini ikki hevur fingið tað innihald, sum fiskivinnunevndin mælti til í áliti sínum. Treytin fyri at fáa minstuløn eftir hesi grein er, at fiskifarið hevur avreitt minst 10 ferðir seinastu tríggjar mánaðarnar. Hetta skeiðið verður roknað soleiðis, at tað er galdandi frá mánaðinum, farið verður í skipanina við minstuløn og tveir mánaðar frammanundan. Tá lógin ikki er lýst, má løgtingið samtykkja lógina umaftur, soleiðis at henda villa verður rættað. Eisini verður neyðugt at gera eina broyting í § 3, har ásett er, at listi yvir manning fyri fyrsta mánaðin skuldi latast inn til Lønjavningargrunn Skipsfiskimanna í seinasta lagi 10. mars 1994. Mælt verður til at broyta hesa orðing, soleiðis at listin fyrstu ferð skal verða Lønjavningargrunninum í hendi í seinasta lagi tveir dagar eftir, at lógin er lýst. Lógin skal hava gildi fyri mars og apríl mánað 1994 og hevur málið tí skund at verða avgreitt og heitir fiskivinnunevndin tí á løgtingið um skjóta viðgerð.

1. viðgerð 21. mars 1994. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 22. mars 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fiskivinnunevndini tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 21. mars 1994 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og upplýst er fyri nevndini, at útróðrarbátar omantyri 20 BRT., sum kundu hugsað sær at roynt skipanina við minstuløn til útróðrarmenn, fella utanfyri skipanina, soleiðis sum treytirnar í § 2 eru orðaðar. Nevndin mælir tí til, at broyta § 2 soleiðis, at setningurin "og at fiskifarið avreiðir minst 25 kilo uppá mannin fyri hvønn veiðidag" verður strikaður og sum nýtt stk. 2 verður sett: "Fyri fiskifør undir 20 BRT. eru harafturat hesar reglur galdandi: a) At fiskifar, sum roynir við snellu ella snøri avreiðir minst 15 kilo upp á mannin fyri hvønn veiðidag". Teir útróðrarmenn, sum ikki lúka treytirnar um minstuløn, verða verandi undir skipanini um minstaforvinning eftir løgtingslóg nr. 32 frá 27. mars 1992 við seinni broytingum. Við hesi broyting mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja fyriliggjandi uppskot og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1) Í § 2 verða orðini ", og at fiskifarið avreiðir minst 25 kilo uppá mannin fyri hvønn veiðidag" strikað.

2) Í § 2 verður sum nýtt stk. 2 sett:
Fyri fiskifør undir 20 BRT. eru harafturat hesar reglur galdandi:
a) At fiskifar, sum roynir við snellu ella snøri, avreiðir minst 15 kilo upp á mannin fyri hvønn veiðidag.
b) At fiskifar, sum roynir við línu, avreiðir minst 25 kilo upp á mannin fyri hvønn veiðidag."

1) I § 2 slettes ordene: ", og at fiskefartøjet lander mindst 25 kilo pr. mand pr. dag".

2) I § 2 sættes som nyt stk. 2:
"For fiskefartøjer under 20 BRT. er yderligere disse regler gældende:
a) At fiskefartøjer, som fisker med snelle eller snøre, lander mindst 15 kilo pr. mand pr. dag.
b) At fiskefartøj, som fisker med langline, lander mindst 25 kilo pr. mand pr. dag."

22. mars 1994 legði Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

Sum nýggj § 8 verður sett:

Landsstýrinum verður heimilað at gera undantøk frá reglunum í grein 2 og 3.

Grein 8 verður grein 9.

Viðmerkingar

Havandi støðu útróðrarmanna í huga og at dømi eru um at útróðrarmonnum hevur forfall verið fyri, orsakað av t.d. sjúku og, at báturin hevur havt maskinbrek, heldur undirritaði tað verða skeivt - órættvíst - at hesir av nevndu orsøk ikki koma undir skipanina um minstuløn.

Tí verður skotið upp, at landsstýrinum verður heimilað at víkja frá treytunum nevndar í grein 8 - 3, soleiðis at útróðrarmenn, ið orsakað av sjúku v.m. ikki kunnu lúka treytirnar, sum nevndar eru í uppskotinum frá fiskivinnunevndini, eisini koma undir skipanina.

2. viðgerð 22. mars 1994. Uppskotið frá fiskivinnunevndini við broytingum frá sonu samtykt við 20-0 atkvøðum. Upprunauppskotið fall við 2-0 atkvøðum.

3. viðgerð 22. mars 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 20-0 atkvøðum.

Lóg nr. 38 frá 24. mars 1994.

168 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1994, friggjadagin 18. mars legði Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

Í § 33 verður sum nýtt nr. 13 sett: "Hjá persóni, sum hevur lønarinntøku herundir fiski- og útróðrarpart, neyðugar útreiðslur í sambandi við ferðing millum bústað og arbeiðsstað eftir reglunum í a - c.

a) Útreiðslur til ferðing við bili millum bústað og arbeiðsstað verða loyvdar frádrignar við ávisari upphædd fyri hvønn koyrdan kilometur.

b) Kann almenn ferðsla verða nýtt í staðin, verður frádráttur loyvdur ájavnt við ferðakostnaðin við almenna ferðasambandinum.

c) Fyri ferðing millum bústað og arbeiðsstað sjóvegis verður frádráttur

lagtingslov om ændring af lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

I § 33 sættes som nyt nr. 13: "Hos en person, der har lønindtægt, herunder indtægter ved partfiskeri, nødvendige udgifter i forbindelse med befordring mellem bopæl og arbejdsplads efter reglerne i a - c.

a) Udgifter til befordring med bil mellem bopæl og arbejdsplads kan fratrækkes med et fast beløb for hver kørt kilometer.

b) Såfremt offentlig befordring kan benyttes, tillades fradrag med samme beløb som udgiften til offentlig befordring.

c) For befordring ad søvejen mellem bopæl og arbejdsplads, tillades fra-

loyvdur ájavnt við útreiðslur, men tó ongantíð meira enn svarandi til ferðakostnaðin við almennum ferðasambandi. Útreiðslurnar sambært reglunum í a-c verða tó bert loyvdar frádrignar í tann mun, samanlagda upphæddin fer upp um eina ávísa upphædd sbr. d.

d) Tær føstu upphæddirnar, ið nevndar eru í a-c verða ásettar av líkningarráðnum.

§ 2.

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og er galdandi frá og við inntøkuárinum 1993.

drag for udgiften, dog aldrig mere end befordring med offentlig befordring. Kun den del af udgifterne efter reglerne i a-c, der overstiger et nærmere fastsat beløb, (jfr. d) kan fradrages.

d) De i a til c omtalte faste beløb fastsættes af Ligningsrådet.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen og er gældende fra og med indtægtsaret 1993.

Viðmerkingar

Landsstýrið (Javnaðar- og fólkaflokkurin) kom 13. november 1992 í tingið við uppskoti um broytingar í skattalógini. Í uppskotinum, sum varð samtykt, varð

persónsfrádrátturin
løntakarafrádrátturin
ferðafrádrátturin

tikin burtur.

Eisini varð rentufrádrátturin lækkaður úr 42% niður í 40%.

Oman á hetta kom so eisini cykaskattur. Samanlagt komu uppskotini, sum fólkaflokslandsstyrismaðurin bar niðan í tingi at merkjast sum steinur oman á byrðu hjá flestu lønmóttakarum.

At hægri skatta- og avgjaldspolitikkurin førdi okkum í ein sosialan aldudal tyktist ikki politiski myndugleikin at geva sær far um. Hann hevði start seg blindan í hesum, at "fáa fleiri krónur í landskassan".

Ein kann so spyrja, hvussu henda sokallaða "frísinnaða" hugsjónin royndist í verki. Ja, úrslitini tala fyri seg.

At dýkja fólkið undir við skatta- og avgjaldsbyrðum hevur ongantíð givið gagnlig úrslit. Men heldur ikki hetta skiltu teir sokallaðu "frísintu", men lótu seg harafturímóti, sum bátur uttan árar og róður, reka við sosialistiska rákinum.

Lyftini um skattalætta gloymdu hesir somu - og hildu helst, at fólkið gjørdi tað sama. Úrslitið

av førda politikki gjørdist ein vanlukka fyri fólkið og føroysku tjóðina.

Uppskotsstillarin hevur áður vist á tað skeiva, at ferðafrádrátturin varð avtikin hjá flest øllum føroyingum, meðan hann fyri summar varð varðveittur. Hetta, at ferðafrádrátturin varð avtikin gjørdist ein dyggur smeitur hjá teim, sum hóast alt enn hava arbeiði og ferðast millum bústað og arbeiðspláss. Ferðafrádrátturin eigur tí sum skjótast aftur at koma inn í skattalógina - og skal ikki verða á lægri støði enn hann var tá lógin varð broytt á vetri 1992.

Tá søgdu bæði sambandsflokkurin og sjálvstýrisflokkurin í skattanevndini seg at vera ímóti at avtaka ferðafrádráttin. Nú fólkaflokkurin er komin aftur í andstøðu er hann helst eisini fyri, at lógin verður broytt. Sostatt roknar uppskotsstillarin við, at meiriluti í tinginum tekur undir við uppskotinum.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í skattanevndina. sum 26. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Tórdi J. Niclasen, løgtingsmanni, tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og vísir til løgtingsmál nr. 65/1993.

2. viðgerð 27. apríl 1994. Uppskotið fall við 0-0 atkvøðum.

169 Broyting í ferðslulógini

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars 1994 legði Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 65 frá 9. sept. 1963 um

lagtingslov om ændring af lagtingslov om færdsel.

§ 1.

I lagtingslov nr. 65 af 9. sept. 1963 om

ferðslu við seinri broytingum verður í § 16 stk. 3 "0,8%" broytt til "0,2%".

§ 2.

Lógin verður sett í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

færdsel med senere ændringer bliver i § 16 stk. 3 "0,8%" ændret til "0,2%".

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar

Nógv hevur verið tosað um vandarnar, ið standast av rúsdrekkakoyring og kemur hesin vandi uttan iva í størri mun at geva seg til kennar, tá nýggja rúsdrekkalógin verður sett í gildi.

Lond rundan um okkum - undantikið Danmark - hava tikið álvaran av rúsdrekkakoyring til eftirtektar og nýta promillumark, ið eru munandi lægri enn galdandi her á landi. Promillumarkið í Danmark er 0,8, Íslandi 0,5, Noreg 0,5, Finniandi 0,5 og í Svøriki 0,2.

Her á landi er nú tíðin komin at lækka promillumarkið og verður hetta gjørt til tess at undirstrika týdningin av promillufríari koyring, sum partur av ábyrgdarfulluri ferðslupolitikki og nýtsluminkandi rúsdrekkapolitikki, soleiðis sum uppskotsstillarin í álitinum til nýggja rúsdrekkalóg vísti á.

Verður uppskotið samtykt, vil tað minka um avleiðingarnar, ið annars standast av "promillukoyring". Nevnast kann, at Rættarnevnd Løgtingsins fyri tveimum árum síðan viðgjørdi líknandi uppskot frá undirritaða og segði nevndin í álitinum m.a., at "landsstýrið arbeiddi við broytingum í ferðslulógini.." og helt nevndin tað tí ikki verða ráðiligt at fremja broytingar uttan samanhang við tey broytingaruppskot, ið fóru at koma frá landsstýrinum. Uttan at seta nakað uppskot fram, mælti nevndin annars til at senda landsstýrinum málið.

Tá nú so drúgv tíð er gingin og einki uppskot hesum viðvíkjandi er komið úr landsstýrinum, verður enn einaferð roynd gjørd at fremja nevndu broytingar í ferðslulógini.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 27. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1994 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Helena Dam á Neystabø, Heini Johansen, Hans Pauli Olsen, Birgir Danielsen) tekur ikki undir við málinum.

Ein minniluti (Lisbeth L. Petersen) tekur undir við málinum.

2. viðgerð 27. apríl 1994. Uppskotið fall við 11-0 atkvøðum.

170 Broytingar í meirvirðisgjaldsskipanini

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 8 frá 8. september 1992 við seinni broytingum verður henda broyting gjørd:

1. Í § 2 stk. 3 a. verður frammanfyri "viðgerð á sjúkrahúsi" sett "heilivágur".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om meromsætningsafgift.

§ 1.

I lagtingslov nr. 8 frá 8. september 1992 med senere ændringer foretages følgende ændring:

1. I § 2 stk. 3 a. indsættes foran "Hospitalsbehandling": "medicin".

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar

Tá lógin um MVG-gjald varð samtykt avgjørdi samgongumeirilutun samstundis, at fólkið, ið her búleikast skuldi gjalda meiri fyri heilivágin - oman á so mangt annað.

31. august 92 legði undirritaði uppskot á ting, har skotið varð upp, at gera broytingar í lógini um meirvirðisgjald, soleiðis at m.a. heilivágur varð undantikin meirvirðisgjaldið.

Uppskotið fekk tíanverri ikki undirtøku og fall.

Undir viðgerðini førdu landsstýrismenn fram, at ikki var neyðugt at frítaka heilivág fyri MVG, tí tað væl bar til, at lækka prísin á heilivági á annan hátt. Hetta er í ein ávísan mun gjørt, men munar ov lítið - serliga hjá teim, ið nýta nógvan heilivág.

Tey, sum hava heilivág fyri neyðini hava av sonnum kent avleiðingarnar av, at landsstýrið hækkaði prisirnar á heiliváei við heilum 23%. Her er talan um 23%, sum verða løgd oman á útsøluprísin ístaðin fyri tey 6%, sum vóru á inntlutningsgjaldi.

Henda hækking hevur rakt meint og kennist sum steinur oman á byrðu hjá mongum húski og einstaklingum kring landið.

Ein ikki óhugsandi avleiðing kann vera, at fólk fara at himpra seg við at keypa tann av læknaanum fyriskipaða heiliváqin.

Harmiligt, at landsstýrið ikki roynir at seta seg inn í støðu teirra, sum hava heiliváq fyri neyðini og sum í hesum døgum, orsakað av øðrum tiltøkum landsstýrisins hava sera trupult við at fáa endarnar at røkka.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Felagsálit

Sí felagsálit í løgtingsmáli nr. 164/93.

2. viðgerð 22. apríl 1994. Uppskotið fall við 5-0 atkvøðum.

171 Løgtingslóg um fiskavraking

Ár 1994, friggjadagin 18. mars legði Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður, vegna tingmenninar Vilhelm Johannesen, Jógvan I. Olsen, Henrik Old, Lassa Klein, Óla Breckmann, Niels Pauli Danielsen, Heina O. Heinesen og seg sjálvan fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um fiskavraking.

§ 1. Allur saltfiskur, ið verður fluttur úr Føroyum, skal, sama til hvat land ella hvønn annan stað í ríkinum, hann verður fluttur, verða mettur og flokkaður av vrakarum undir umsjón yvirvrakara ella vrakieftirlitsmanni. Somuleiðis skal fiskurin verða vigaður á vektum, sum uppfylla tær treytir, ið landsstýrið harum fyriskipar.

2. stk. Yvirvrakari og vrakieftirlitsmenn skulu í báðum teimum førum, sum nevnd eru í 1. stk., hava umsjón við, hvussu fiskurin er innskipaður, løddur og viðfarin í útflutningsskipinum. Fyriskipanir teirra hesum viðvíkjandi eru allir viðkomandi skyldugir at lýða. Hvørjum fiskifarmi skal fylgja váttan yvirvrakara ella vrakieftirlitsmanna, skrivað á farmaprógvið.

3. stk. Allur fiskur skal verða væl saltaður og umrivin seinast 8 dagar aftaná, at hann er dripin: Fiskur, sum er skipaður upp í Føroyum sum saltfiskur, skal, tá ið hann verður uppskipaður - ífall manning ella reiðari ynskir tað undir vrakieftirliti - verða vigaður á tann hátt, sum nevndur er í 1. stk. Tó er landsstýrinum heimilt at gera av, at váttan frá vrakara, sum var hjástaddur, tá ið fiskurin varð skipaður upp á land, og sum inniheldur álit vrakarans á góðsku, salting og ætlaðari vekt av fiskifarminum, tá ið hann varð uppskipaður, og í hagreiðing fisksins frammanundan gongur í staðin fyri meting, flokkan og vigan. Er nú fiskurin ikki fullsaltaður (umrivin), tá ið hann verður uppskipaður, gevur vrakarin váttan um hetta, eins og hann í váttanini

lagtingslov om fiskevragning.

§ 1. Al saltfisk, som udføres fra Færøerne, skal uanset til hvilket land eller hvilke dele af det øvrige kongerige, udførslen sker, af vragere under overvragerens eller en vragerkontrollørs opsyn vurderes og klassificeres, ligesom den skal opvejes på vægte, der opfylder de krav, der stilles i de derom af landsstyret givne forskrifter.

Stk. 2. Overvrageren og vragerkontrollørerne skal i de i stk. 1 nævnte tilfælde føre tilsyn med fiskens indskibning, stuvning og behandling i fragtskibene. Deres krav i så henseende er alle vedkommende pligtige at adlyde. Med hver fiskeladning skal følge overvragerens eller vragerkontrollørens attest, der påtegnes konossementerne.

Stk. 3. Al fisk skal være velsaltet og omlagt senest 8 dage efter, at den er dræbt. Fisk, som ilandbringes på Færøerne som saltfisk, skal ved ilandbringelsen - ifald mandskab eller rejer ønsker det under vragerkontrol opvejes på samme måde som i stk. 1 omtalt. Landsstyret kan dog bestemme, at en af den ved ilandbringelsen tilstedeværende vrager udstedt attest, indeholdende vragerens bedømmelse af den pågældende fiskeladnings kvalitet, saltningsgrad og antagelige vægt ved ilandbringelsen og hvilken foregående behandling, fisken har været underkastet, kan træde i stedet for vurdering, klassificering og opvejning. Forsåvidt fisken ved ilandbringelsen ikke måtte være fuldsaltet (omlagt), afgiver vrageren attest herom, lige-

ásetir. nær ið meting, flokkan og vigan skal vera. Landsstýrið kann gera av. at váttanin. sum nevnd er í 2. punktum. gongur í staðin fyri meting, flokkan og vigan. Framvegis skal allur saltfiskur. sum ikki hevur verið vrakaður áður, verða vrakaður. fyrstu ferð hann verður seldur í Føroyum. Eisini um hesa vraking kann vrakari geva váttan.

4. stk. Tær váttanir, sum gjørdar eru um meting, flokkan og vigan, hava í rættarviðurskiftum alment sannleiksgildi. Tó er ikki lokað fyri mótprógvi.

5. stk. Loyvt er vrakieftirlitsmanni. tá ið hann fær samtykki frá yvirvrakara. at veita vrakara fulltrú til at starvast í staðin fyri seg sum vrakieftirlitsmaður. Um hetta verður gjøllari fyriskipað í starvsreglugerðini, ið umrødd er í 6. stk.

6. stk. Gjøllari reglur um vrakingina og vøruviðgerðina, bæði meðan hon verður skipað og umborð í farmaskipunum. verða settar í starvsreglugerð fyri vrakieftirlitsmenn, sum landsstýrið gevur út.

§ 2. Landsstýrið skipar yvirvrakara, sum hevur í hendi umsjón við allari fiskavraking í Føroyum. Yvirvrakarin røkir saman við einum vrakieftirlitsmanni í § 3. stk. 1. nevndu økjum:

I Norðoyggjar,
II Eysturoy,
III Suðuroy og
IV Streymoy, Vágoy og Sandoy.

Eisini er hann ráðgevari hjá tí almenna í málum viðvíkjandi fiskavraking- og virking. Løn hansara verður ásett í tænastumannalógini.

§ 3. Landsstýrið skipar vrakieftirlitsmenn við tænastustað í 4 økjum:

I Norðoyggjar,
II Eysturoy,
III Suðuroy, Vágoy og Sandoy.

Løn teirra verður ásett í tænastumannalógini.

som han i attesten fastsætter det tidspunkt. hvor vurdering. klassificering og opvejning skal finde sted. Landsstyret kan bestemme. at den i 2. punktum nævnte attest træder i stedet for vurdering, klassificering og opvejning. Endvidere skal der finde vragning sted af al ikke tidligere vraget saltfisk, første gang den sælges på Færøerne. Også om denne vragning kan vragere udstede attest.

Stk. 4. De om den stedfundne vurdering, klassificering og opvejning udfærdigede attester har i retlige forhold offentlig troværdighed. Modbevis er dog ikke udelukket.

Stk. 5. En vragerkontroilør kan med overvragerens samtykke meddele en vrager fuldmagt til at udføre hvervet som vragerkontrollør i sit sted. Der træffes herom nærmere bestemmelser i det i stk. 6 nævnte arbejdsregulativ.

Stk. 6. Nærmere regler om vragningen og varens behandling både ved indskibningen og i fragtskibene fastsættes i et af landsstyret udstedt arbejdsregulativ for vragerkontrollører og vragere.

§ 2. Overvragere. der udnævnes af landsstyret, fører tilsyn med al vragning af fisk på Færøerne. Overvrageren passer sammen med en vragerkontrollør de i § 3. stk. 1 nævnte distrikter:

I Norðoyggjar.
II Eysturoy,
III Suðuroy og
IV Streymoy, Vágoy og Sandoy.

Han er tillige det offentliges konsulent i sager angående vragning og tilvirkning af fisk. Hans lønning fastsættes ved tjenestemandsloven.

§ 3. Vragerkontrollører udnævnes af landsstyret med tjenestested i området:

I Norðoyggjar.
II Eysturoy,
III Suðuroy og
IV Streymoy, Vágoy og Sandoy.

Deres lønning fastsættes i tjenestemands-

2. stk. Tað ber til at broyta talið á vrakieftirlitsmonnum við veiting á liggjarlógini.
3. stk. Vrakieftirlitsmenn skulu greiða ur hondum tey størv, ið tilskilað eru í §§ 1 og 7.
4. stk. Vrakieftirlitsmenn skulu, áðrenn teir verða skipaðir í starvið, hava fingið neyðturviligan kunnleika um fiskavraking og um, hvussu fiskurin eigur at verða virkaður og hagreiddur, annaðhvørt við tí at hava starvað sum fiskavrakari ella á annan hátt.
5. stk. Teir skulu, áðrenn teir taka við starvi, undirskriva trygdarorð, sum landsstýrið fyriskipar, um, at teir vilja fylgja teimum reglum, ið settar verða viðvíkjandi starvi teirra, og fidnir og nærlagdir røkja tær skyldur, sum á teimum hvíla í støðu teirra.

§ 4. Útreiðslur landskassans til lønir yvirvrakara og vrakieftirlitsmanna, dagpeningur teirra og ferðakostnaður verða sum part goldnar við tað, at í teimum í § 1, 1. og 2. stk., nevndu førum skal hann, sum vrakað er fyri, lata í avgjaldi 5 oyru av hvørjum 100 kg av saltfiski.
2. stk. Tá ið serliga ber til, hevur landsstýrið heimild til fyribils at lækka hetta avgjaldið ella sleppa tí.
3. stk. Landsstýrið setur reglurnar um, hvussu avgjaldið skal rindast.

§ 5. Løn yvir- og eftirlitsvrakara fyri arbeiði teirra við vraking verður hann at gjalda, ið vrakað er fyri eftir reglum, sum landsstýrið setur í starvsreglugerð vrakaranna.
2. stk. Gerst tað neyðugt, verða hesar útreiðslur latnar úr landskassanum frammanundan.
3. stk. Í hesum reglugerðum skal vera heimilt at gera av, annaðhvørt hvør útflytari sær skal greiða hesi avgjøld, ella um tey skulu verða líknað á allar útflytarar.
4. stk. Verður ósemja teirra millum, sum eiga lut í máli av rokningum vrakaranna

loven.
Stk. 2. Antallet af vragerkontrollører kan ændres ved bevilling på finansloven.
Stk. 3. Der påhviler vragerkontrollørerne de i §§ 1 og 7 ommeldte opgaver.
Stk. 4. Vragerkontrollørerne skal forinden deres beskikkelse have erhvervet sig det fornødne kendskab til vragning af fisken og fiskens tilvirkning og behandling, enten ved beskæftigelse som vrager eller på anden måde.
Stk. 5. De skal, forinden de begynder deres virksomhed, underskrive en højtidelig forsikring i en af landsstyret fastsat form om, at de vil rette sig efter de bestemmelser, der træffes angående deres virksomhed, og at de med flid og nidkærhed vil opfylde de pligter, der påhviler dem i deres bestilling.

§ 4. Til delvis dækning af landskassens udgifter til overvragerens og vragerkontrollørernes lønninger, dagpenge og rejseudgifter vil der i de i § 1, stk. 1 og 2 ommeldte tilfælde af rekvirenten være at erlægge en afgift af 5 øre pr. 100 kg saltfisk.
Stk. 2. Denne afgift kan landsstyret under særlige omstændigheder midlertidig nedsætte eventuelt frafalde.
Stk. 3. De nævnte forskrifter om afgiftens betaling fastsættes af landsstyret.

§ 5. Overvragerens og vragernes løn for deres arbejde med vragningen betales af rekvirenten efter regler, der nærmere fastsættes i vragernes arbejdsregulativ.
Stk. 2. Om fornødent udredes de pågældende omkostninger, forskudsvis af landskassen.
Stk. 3. I disse regulativer skal kunne træffes bestemmelse om, hvorvidt hver enkelt eksportør for sit vedkommende skal bære disse afgifter, eller hvorvidt der skal finde en fordeling sted af disse samtlige eksportører.
Stk. 4. I tilfælde af uenighed mellem de pågældende angående vragernes regninger

eftir hesi lóg, sker sýslumaðurin úr, og er avgerð hansara bindandi.

§ 6. Umframt starv sítt við at vraka klippfisk til útflutnings og saltfisk skulu vrakieftirlitsmenn verða skyldugir at ferðast um í umdømum sínum til tess at leiðbeina fiskahagreiðingini, og skal yvirvrakarin skipa fyri umferðum teirra. Í starvsreglugerðunum verður avgjørt, hvussu kostnaðurin verður at greiða.

stk. 2. Vrakieftirlitsmenn skulu harafturat, um tað er kravt, og tað ikki bagir starvi teirra annars verða skyldugir at hjálpa til at døma um fisk eisini í øðrum førum enn nevnd eru í § 1, 4. stk.; tá skal hann, sum hevur biðið hesa hjálp, gjalda vrakarunum løn teirra, dagpening og ferðakostnað eftir teimum reglum, sum um hetta eru settar.

ifølge nærværende lov, skal sysselmanden kunne dicidere med bindende virkning.

§ 6. Foruden deres virksomhed ved vragning af klipfisk til eksport og saltfisk skal vragerkontrollørerne være pligtige til efter en af overvrageren fastsat turnus at rejse om i deres distrikter for at vejlede folk med hensyn til behandlingen af fisk og føre tilsyn med den. I regulativerne vil der være at træffe bestemmelse om, hvorledes omkostningerne skal afholdes.

Stk. 2. Endvidere skal vragerkontrollørerne og vragerne være pligtige til, om det forlanges, og det kan forenes med deres øvrige virksomhed, at yde deres medvirken ved bedømmelsen af fisk udover de i § 1, stk. 4, nævnte tilfælde, i så fald betales vragernes lønninger, dagpenge og rejseudgifter af den, der har forlangt deres medvirken med den i henhold til de herom gældende regler fastsatte betaling.

§ 7. Brot móti reglunum í hesari lóg verða revsað við sektum, ið leggjast til landskassan.

2. stk. Sakarmál av hesum brotum verða at viðgera sum løgreglumál.

§ 7. Overtrædelse af de i denne lov indeholdte bestemmelser straffes med bøder, der tilfalder landskassen.

Stk. 2. Sager i anledning af disse overtrædelser behandles som politisager.

§ 8. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 8. Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar

Við løgtingslóg nr. 12 frá 12. januar 1950 vórðu ávísar reglur um fiskavraking settar í gildi í Føroyum.

Hesar reglur vóru galdandi í nærum 41 ár. Í 1990 varð onnur løgtingslóg samtykt, sum við gildi frá 1. januar 1991 setti lógina um fiskavraking frá 1950 úr gildi.

Sambært løgtingslógini frá 1950 um fiskavraking varð ein almennur vrakarastovnur skipaður, sum var undir leiðslu av einum yvirvrakara. Landið varð skipað í átta vrakaradømir. Í hvørjum vrakaradømi stóð ein vrakieftirlitsmaður fyri tí dagliga arbeiðnum hjá stovninum. Yvirvrakarin og vrakieftirlitsmenninir vórðu løntir av tí almenna.

Til tað dagliga arbeiðið í sambandi við fiskalandingar og pakking av fiski til útflutnings høvdu vrakieftirlitsmenninir sonevndar fiskavrakarar. Hesir, ið vórðu løntir av virkjunum, fingu vanliga tímaløn + 80%. Hjá virkjunum var stór ónøgd við hesa eykasamsýning. Tað var helst

meginorsøkin til, at lógin um fiskavraking varð sett úr gildi frá 1. januar 1991.

Orsøkin til eykasamsýningina var m.a. tann, at vrakarin í sínum arbeiði, kundi koma í ta støðu, at hann gekk virkisleiðsluni ov nær, og tí kundi koma at vera fyri vanbýti, tá talan var um annað arbeiði enn fiskavraking, í tíðarskeiðum, tá einki vrakaraarbeiði var. Tann serliga ábyrgdin, sum varð løgd á ein fiskavrakara, taldi sjálvandi eisini við, tá eykasamsýningin varð ásett.

Øll tey árini, sum vrakarastovnurin virkaði, hevði føroyskur fiskur - serstakliga saltfiskurin - avbera gott orð á sær hjá okkara keyparum og millum brúkarar í keyparalondunum. Hetta komst sjálvandi av, at so leingi vrakarastovnurin virkaði, høvdu vit eina einsháttaða flokking í støddir og eina einsháttaða vraking í góðskustig (nr. 1, 2, 3 og vrak). Undir hesi skipan bar til at tosa um "Føroya fisk" undir einum, og keyparin var altíð vísur í, hvat tað var, hann keypti.

Síðani vrakarastovnurin helt uppat at virka, hevur tilvildin valdað, bæði viðvíkjandi flokking í støddir og viðvíkjandi vraking í tey ymisku góðskustigini. Síðani tá hevur hvørt virkið sær, sett treytirnar um flokking í støddir, og um vraking í góðskustig. Úrslitið er, at hin áður so væl kendi og væl umtókti "Føroya fiskurin" ikki er at finna á marknaðinum longur. Í dag kann keyparin ikki vera vísur í, at hann fær ta vøruna, sum hann hevur ynskt og heldur seg hava keypt.

Uppskotsstillararnir eru vitandi um, at tað hevur verið sera trupult hjá føroyingum at selja saltfisk tey seinastu gott og væl tvey árini, at miðalprísurin er fallin munandi, og at talið av "reklamatiónum" er nógv vaksið hesi árini og hevur verið munandi størri enn árini frammanundan. Orsøkin til hetta er sjálvandi tann, at vit ikki longur hava eina einsháttaða flokking í støddum og eina einsháttaða vraking í góðskustig.

Samstundis eru vit vitandi um, at keyparar heldur enn fegnir vilja keypa føroyskan saltfisk og geva munandi hægri pris enn tann, sum er og hevur verið galdandi seinastu tvey árini, men hetta er treytað av, at fiskurin verður flokkaður og vrakaður eftir teimum reglum, ið vóru galdandi áðrenn 1. januar 1991. Keypararnir ynskja, at vøran, ið teir keypa, hevur eitt blátt stempul frá einum alment góðkendum stovni.

Tann vánaliga støðan, sum vit føroyingar eru í saltfiskamarknaðinum, hevur m.a. ført við sær, at langfaratrolararnir hava fingið boð um, at teir skulu leggja seg eftir at veiða fisk, ið er egnaður til flakaframleiðslu. Hetta hevur aftur ført við sær, at trolararnir hava sigit undan fiski, tá talan hevur verið um stóran tosk, sum einans kann nýtast til saltfiskaframleiðslu. Hetta er stórt spell.

Í hjálagda lógaruppskoti verður mælt til at endurskipa vrakarastovnin við serligum atliti til saltfiskaframleiðslu og saltfiskaútflutning. Skotið verður upp, at seta ein yvirvrakara at skipa Føroyar í fýra vrakaradømi og at seta fýra vrakieftirlitsmenn. Ein fyri hvørt av teimum fýra vrakaradømunum. Eftir uppskotinum verða vrakaradømini hesi: 1) Norðoyggjar, 2) Eysturoy, 3) Suðuroy og 4) Streymoy, Sandoy og Vágar. Gingið verður út frá, at yvirvrakarin heldur til í 4. vrakaradøminum og soleiðis kann verða vrakieftirlitsmanninum har til hjálpar.

Yvirvrakarin, sum var, er sagdur úr starvi. Tað sama er hent við tveimum vrakieftirlits-

monnum. Hesir eru allir tænastumenn og hava harvið rætt til løn í trý ár. Á gaidandi fíggjarlóg eru 2.000.000 kr. settar av til góðskuettirlit. Sostatt kann ein endurskipaður vrakarastovnur rekast uttan nakra eykajáttan í 1994.

1. viðgerð 24. mars 1994. Málið varð beint í ídnaðarnevndina. Burturdottið vegna samgonguslit.

172 Broyting í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 179 frá 18. desember 1992 um serligt avgjald á brenniolju við seinni broyting verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, stk. 6 verður orðað soleiðis:
"**Stk. 6.** Føroya Gjaldstova kann innheinta við panting avgjøld og rentur, ið fallin eru til gjaldingar."
2) Í § 2 verður sum nýtt stk. 3 sett:
"**Stk. 3.** Niðanfyri standandi meirvirðisgjaldskrásettu virki hava rætt til at fáa endurgoldið tað gjald, sum tey hava goldið sambært § 1:
Garðyrki og plantuskúlar.
Fiskaaling.
Ídnaður.
Gistingarhús.
Vallaraheim.
Farmaflutningsvirki."
3) Stk. 3 í § 2, ið hereftir verður stk. 4,

lagtingslov om ændring i lagtingslov om særlig afgift på brændselsolie.

§ 1.

I lagtingslov nr. 179 af 18. december 1992 om særlig afgift på brændselsolie med senere ændring foretages følgende ændringer:

1) § 1, stk. 6 affattes således:
"**Stk. 6.** Føroya Gjaldstova kann inddrive ved pantning forfaldne afgifter og renter."
2) I § 2 indsættes som nyt stk. 3:
"**Stk. 3.** Følgende momsregistrerede virksomheder har ret til at få refunderet det beløb, de har betalt i henhold til § 1:
Havebrug og planteskoler.
Fiskeopdræt.
Industri.
Hoteller.
Vandrehjem.
Fragttransportvirksomheder."
3) Stk. 3 i § 2, der herefter bliver stk. 4,

verður orðað soleiðis:

'**Stk. 4.** Landsstýrinum verður heimilað í kunngerð at áseta nærri reglur um hvørji virki koma undir stk. 3 og um endurrindan av gjaldinum sambært hesi lóg."

4) Í § 3 verður aftaná orðini "Brot móti hesi lóg" sett: "ella kunngerð við heimild í hesi lóg".

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. apríl 1994.

Stk. 2. Endurgjald sambært § 1. nr. 2 verður veitt fyri olju, ið er latin eftir 1. apríl 1994.

affattes således:

"**Stk. 4.** Landsstyret bemyndiges til i bekendtgørelse at fastsætte nærmere regler for hvilke virksomheder kommer under stk. 3 og om refusion af afgiften i henhold til denne lov."

4) I § 3 indsættes efter ordene "Overtrædelse af denne lov": "eller bekendtgørelse med hjemmel i denne lov".

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. april 1994.

Stk. 2. Refusion i henhold til § 1. nr. 2 ydes for olie, der er leveret efter 1. april 1994.

Viðmerkingar:

Í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið fyri 1994 boðaði landsstýrið frá, at landsstýrið fyri at lætta um hjá vinnuni fór at taka brennioljugjaldið av hjá framleiðsluvirkjum og fór at leggja uppskot fyri tingið um at sleppa fiskavirkjum, iðnaðarvirkjum og gistingarhúsum undan oljugjaldi.

Brennioljugjaldið varð tí sett til 77 mió. kr. í 1994 ella 9 mió. kr. lægri enn í 1993.

Landsstýrið arbeiðir við uppskoti til kunngerð, sum nágreiniligari vísandi til vinnuskránna vísir, hvørji virki kunnu fáa brennioljugjaldið aftur goldið og hvussu hetta skal gerast.

Fiskavirkir eru ikki nevnd í sjálvum lógaruppskotinum, tí hesi koma undir iðnað í vinnuskránni.

Tey virki, sum hava rætt til at fáa endurgoldið brennuoljugjaldið, kunnu søkja Toll- og Skatustovu Føroya um at verða skrásett sum virki, ið sleppa undan brennioljugjaldinum.

Umsóknarblað verður at fáa á Toll- og Skattstovu Føroya.

Í umsóknini skulu virkini útgreina, um tey bert hava lutvísan rætt til endurrindan av oljugjaldinum, sum nærri ásett í kunngerðini.

Virki, ið hava felags oljukeyp við annað virki ella privat húsarhald (t.d. til hitaskipan), kunnu draga lutfalsligan part av oljugjaldinum frá, eftir somu reglum og við sama býtislutfalli, sum verður nýtt við uppgerð av meirvirðisgjaldinum.

Virki, ið hava blandað virksemi, og bert fyri ein part av virkseminum uppfylla treytirnar fyri endurrindan, fáa bert rætt til lutvísan frádrátt fyri oljugjald, svarandi til hendan partin av

virkseminum.

Virki, ið hava rætt til endurrindan av serliga oljugjaldinum, skulu draga avgjaldið frá við avrokningini av meirvirðisgjaldinum.

Mett verður, at tað lættir munandi bæði um umsitingina og eftirlitið at tengja avrokningina at meirvirðisgjaldsskipanini.

Mett verður á Toll- og Skattstovu Føroya at tekniska fyrireikingin av umsitingini av hesi lógarbroyting, broyting í EDV-programmum, nýggjar blankettir o.s.fr. kemur at kosta umleið kr. 100.000,-. Toll- og Skattstovan ger vart við, at hesar eykaútreiðslur ikki rúmast innan verandi fíggjarkarmar hjá stovnunum fyri 1994.

Bæði Føroya Gjaldstova og Toll- og Skattstova Føroya hava gjørt vart við tørvin av greiðari reglum viðvíkjandi innkrevjingini.

1. viðgerð 22. mars 1994. Málið vard beint í skattanevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 22. mars 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Lasse Klein, Jacob Lindenskov, Heini O. Heinesen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Ein minniluti (Jógvan Sundstein) er samdur við nevndini, men ynskir at fáa nærri útgreining av, hvat ídnaður er.

Ein annar minniluti (Finnbogi Arge) tekur undir við uppskotinum, men hevur ta viðmerking, at orðið "ídnaður" í § 2 í landsstýrisuppskotinum átti at verið gjøllari útgreinað.

2. viðgerð 15. apríl 1994. Uppskotið samtykt við 29-0 atkvøðum.

3. viðgerð 21. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

FL jnr. 2520-2/90.

Lóg nr. 66 frá 10. mai 1994.

173 Løgtingslóg um ábyrgdargrunn

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Bergur Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

Løgtingslóg um ábyrgdargrunn.

§ 1. Settur verður á stovn grunnur, "Ábyrgdargrunnurin". Landsstýrið setur játtanina á rakstrarstaði 18686: "Vinnufremjandi virksemi" í fíggjarlógini fyri 1994 í grunnin.

§ 2. Endamál grunsins er at stuðla nýggjum tiltøkum og nýggjum framleiðslum innan vinnulívið.
Stk. 2. Landsstýrið kann í kunngerð áseta nærri reglur um virki grunsins.

§ 3. Ábyrgdargrunnurin verður umsitin av landsstýrinum, jbr. tó stk. 2.
Stk. 2. Landsstýrið kann leggja umsitingina av grunninum til ein landsstovn ella eitt stýri við umboðum fyri landsstýrið og fíggjar- og peningastovnar.

§ 4. Landsstýrið kann veita ábyrgd fyri afturgjalding av nýggum lánum, ið fíggjar- og peningastovnar veita virkjum og einstaklingum. Landsstýrið veitir einfalda (simpla) borgan.
Stk. 2. Borgast kann fyri í mesta lagi 50%, tó í mesta lagi 500.000 kr., av tí upphædd fíggjar- ella peningastovnar missa, um lánið ikki verður afturgoldið og trygdirnar ikki halda.
Stk. 3. Landsstýrið borgar fyri lánum eftir umsókn frá fíggjar- og peningastovnum.
Stk. 4. Borgast kann bert fyri lánum til nýggjar verkætlanir. Nýggjar verkætlanir eru tiltøk og framleiðslur, sum virkið ella einstaklingurin ikki áður hevur fingist við.

lagtingslov om garantifond.

§ 1. Der bliver oprettet en fond, "Garantifonden". Landsstyret sætter bevillingen på driftskonto 18686: "Erhvervsfremmeforanstaltninger" i finansloven for 1994 i fonden.

§ 2. Fondens formål er at støtte nye aktiviteter og nye produktioner i industrien.
Stk. 2. Landsstyret kan i bekendtgørelse fastsætte nærmere bestemmelser om fondens virksomhed.

§ 3. Garantifonden administreres af landsstyret, jvf. dog stk. 2.
Stk. 2. Landsstyret kan lægge administrationen af fonden til en institution under landsstyret eller til et styre sammensat af repræsentanter for landsstyret og finansierings- og pengeinstitutter.

§ 4. Landsstyret kan garantere for tilbagebetalingen af nye lån, som finansierings- og pengeinstitutter giver virksomheder og enkeltpersoner. Landsstyret stiller simpel kaution.
Stk. 2. Kaution kan stilles for maksimum 50%, dog maksimalt 500.000 kr., af det tab finansierings- eller pengeinstitutter lider, hvis lånet ikke bliver tilbagebetalt og sikkerhederne ikke holder.
Stk. 3. Kautionen stilles af landsstyret efter ansøgning fra finansierings- og pengeinstitutter.
Stk. 4. Der kan kun stilles kaution for lån til nye projekter. Nye projekter er nye aktiviteter og nye produktioner, som virk-

Borgast kann ikki fyri lánum, sum eru givin áðrenn lógin kom í gildi, og landsstýrið kann ikki borga fyri umlegging av skuld.

Stk. 5. Fíggjar- og peningastovnarnir gjalda Ábyrgdargrunninum 1% p.a. av restskuldini av lánum, ið landsstýrið borgar fyri. Hetta avgjald verður nýtt til møguligar avskrivingar og til umsiting av skipanini.

Stk. 6. Landsstýrið kann bert borga fyri einum láni til ein og sama persón. Við sama persón skilst eisini hjúnafelagar, ógift samlivandi og felløg, har persónurin eigur ella hevur átt minst helvtina av felagskapitalinum ella har persónurin hevur ella hevur havt avgerandi ávirkan.

somheden eller enkeltpersonen ikke tidligere har drevet. Der kan ikke stilles kaution for lån, der er ydet før lovens ikrafttræden, og landsstyret kan ikke stille kaution i forbindelse med gældsomlægning.

Stk. 5. Finansierings- og pengeinstitutter betaler et bidrag til Garantifonden på 1% p.a. af restgælden af de lån, landsstyret har kautioneret for. Bidraget går til mulige tabshensættelser og til administration af ordningen.

Stk. 6. Landsstyret kan kun stille kaution for ét lån til samme person. Som samme person anses også ægtefæller, ugifte samlevende og selskaber, hvori de nævnte personer ejer eller har ejet mindst halvdelen af selskabskapitalen eller råder over eller har rådet over en bestemmende indflydelse.

§ 5. Borgast kann í mesta lagi fyri innistandandi í Ábyrgdargrunninum.

§ 5. Kaution kan højst stilles for indestående i Garantifonden.

§ 6. Borganin er galdandi í upp til 8 ár frá tí at lánið er veitt og verður niðurskrivað í mun til afturgjaldingina av láninum.

§ 6. Kautionen løber i indtil 8 år fra ydelsen af lånet og skal nedskrives i forhold til tilbagebetalingen af lånet.

§ 7. Gjaldstovan kann innkrevja tað, landsstýrið hevur til góðar, um borganin verður effektiv, við rentum, við at afturhalda løn o.a. hjá lántakaranum, sambært reglunum fyri innkrevjan av persónsskatti í samtíðarskattalógini.

§ 7. Gjaldstovan kan med tillæg af renter inddrive landsstyrets tilgodehavende efter indfrielse af en kaution ved indeholdelse i løn m.v. hos låntager efter reglerne for inddrivelse af personlige skatter i kildeskatteloven.

§ 8. Lógin fær gildi dagin eftir hon er lýst.

§ 8. Loven træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Endamálið við Ábyrgdargrunninum er at stuðla fólkum og virkjum at seta í gongd nýggj tiltøk og nýggjar framleiðslur innan vinnulívið. Ábyrgdarskipanin skal gera tað lættari hjá ígongdsetaranum at fáa fígging og hjá fíggjar- og peningastovnum at veita fígging. Skipanin kann ikki nýtast til at gjalda gamla skuld við.

Landsstýrið kann veita ábyrgd fyri afturgjalding av nýggjum lánum, ið fíggjar- og peningastovnar veita virkjum og einstaklingum. Borgast kann fyri í mesta lagi 50%, tó í mesta lagi 500.000 kr., av tí upphædd fíggjar- ella peningastovnar missa, um lánið ikki

verður afturgoldið og trygdirnar ikki halda. Borganin verður sostatt bert effektiv tá fíggjar- ella peningastovnar ásanna eitt tap. Skipanin ber í sær, at tann, ið ger íløguna, missir pening um verksetlanin miseydnast, eins og landsstýrið og lánveitandi fíggjar- ella peningastovnur bera hvør 50% av møguligum tapi.

Borgast kann í mesta lagi fyri innistandandi í Ábyrgdargrunninum, og borganin er galdandi í upp til 8 ár frá tí at lánið er veitt.

Um borganin verður effektiv, missir landsstýrið í mesta lagi tær 25 mió. kr., ið er játtanin í fíggjarlógini fyri 1994 til vinnufremjandi virksemi og sum settar verða í grunnin. So hvørt sum lánini verða afturgoldin og borganin hervið niðurskrivað í sama mun, kann grunnurin átaka sær at borga av nýggjum.

1. viðgerð 22. mars 1994. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 22. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 22. mars 1994 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilutа og tveir minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Karl Heri Joensen og Tordur J. Niclasen) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Anfinn Kallsberg) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins. Fyriliggjandi uppskot er eitt av teimum, sum føroyska búskaparnevndin hevur skotið upp í sínum áliti.

Í staðin fyri at tora at gera tað, ið neyðugt er fyri at fáa búskapin aftur á føtur, nevniliga at fáa kappingarføri aftur í føroyskt vinnulív, leypur man um garðin, har hann er lægstur, og byrjar aftur at játta almennan pening fyri at økja virksemið. Hetta er sum hjá kellingunum, sum pissa í sokkin. Vit kunnu nýta so nógvan almennan risikopening, sum vit vilja, men lønsemi í vinnu verður ikki betri av tí.

Vit mugu tí í staðin fremja tað, ið fólkaflokkurin ferð eftir ferð hevur víst á, at vit mugu broyta fyritreytirnar hjá vinnuni soleiðis, at hon aftur loysir seg. Gera vit tað, so er hvørki neyðugt við almennum partapeningi ella almennum lánum, tí tá eru fíggingarmøguleikar.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen) hevur hesar viðmerkingar:

Viðvíkjandi lóg um ábyrgdargrunn, umsitin av landsstýrinum ella verandi landsstovni, har ætlanin er at stuðla nýggjum tiltøkum og nýggjum framleiðslum innan vinnulívið, og har peningur er tøkur á verandi fíggjarlóg, tekur minnilutin undir við.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið samtykt við 25-0 atkvøðum.

3. viðgerð 27. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

Lóg nr. 69 frá 10. mai 1994.

174 Løgtingslóg um stuðul til menning av fiskivinnu á landi

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um stuðul til menning av fiskivinnu á landi.

Kapittul 1
Virking av vørum úr 3. lands fiski.

§ 1. Heimilað verður landsstýrinum í fíggjarárinum 1994 at veita føroyskum fiskavirkjum, ið virka vørur úr 3. lands fiski og útflyta vørurnar til ES-marknaðin, stuðul til javning móti tollverju.
Stk. 2. Stuðul kann verða veittur við upp til 80% av munin millum ES-tollin á føroyskt framleiddum vørum úr 3. lands fiski og ES-tollin á óvirkaðum 3. lands fiski.
Stk. 3. Stuðul kann játtast til verkætlanir, ið fevna um virking og útflutning av 3. lands fiski, krabbadýrum, skeljadýrum o.a. til ES-marknaðin. Stuðulin kann útgjaldast sambært skjalprógvum fyri inn- og útflutningi og goldnum tolli.

lagtingslov om støtte til udvikling af fiskerierhvervet på land.

Kapitel 1
Produktion af varer af 3. lands fisk

§ 1. Landstyret bemyndiges til i finansåret 1994 at bevilge færøske fiskerivirksomheder, der producerer varer af 3. lands fisk og eksporterer varerne til EU-markedet, støtte til toldudligning.
Stk. 2. Støtten kan bevilges med op til 80% af forskellen mellem EU-tolden på færøsk producerede varer af 3. lands fisk og EU-tolden på råvarer af 3. lands fisk.
Stk. 3. Støtten kan bevilges til projekter, der består af produktion og eksport af 3. lands fisk, krebsdyr, skaldyr m.m. til EU-markedet. Støtten kan udbetales efter fremlæggelse af dokumentation for import og eksport og betalt told.

Kapittul 2
Stuðul til vørumenning o.a.

§ 2. Heimilað verður landsstýrinum í fíggjarárinum 1994 at veita stuðul til vørumenning o.a. á føroyskum fiskavirkjum.
Stk. 2. Stuðul kann játtast til verkætlanir, ið miða móti menning av framleiðsluni, vørumenning og sølumenning.

§ 3. Treytin fyri stuðuli er:
a) at løgd verður fram ítarleind frágreiðing um verkætlanina, íðarætlan og meting um kostnað og inntøkur og
b) at verkætlanin kann menna fiskavirkingina á landi yvirhøvur og gevur virðisøking til samfelagið.

§ 4. Landsstýrið kann játta í stuðuli upp til 1/3 av kostnaðinum fyri verkætlanina.

Kapittul 3
Felagsreglur

§ 5. Stuðul eftir hesi lóg verður at taka av játtanini á rakstrarstaði 18584: "Javning móti tollverju" í fíggjarlógini fyri 1994.

§ 6. Landsstýrið kann í kunngerð áseta nærri reglur fyri veitan av stuðuli sambært hesi lóg.

§ 7. Henda lóg fær gildi dagin eftir, hon er kunngjørd, tó hevur § 1 gildi frá 1. januar 1994.

Kapitel 2
Støtte til produktudvikling m.m.

§ 2. Landsstyret bemyndiges til i finansåret 1994 at yde støtte til produktudvikling m.m. på færøske fiskerivirksomheder.
Stk. 2. Støtten kan bevilges til projekter, hvis formål er at udvikle produktionen, produktudvikling og salgsudvikling.

§ 3. Betingelsen for støtte er:
a) at der fremlægges en redegørelse over projektet, tidsplan og vurdering af omkostninger og indtægter og
b) at projektet overhovedet kan udvikle fiskeritilvirkningen på land og skaber værdiforøgelse for samfundet.

§ 4. Landsstyret kan bevilge op til 1/3 af projektets omkostninger.

Kapitel 3
Fællesregler

§ 5. Støtte efter denne lov bevilges af driftskonto 18584: "Toldudligningstilskud" i finansloven for 1994.

§ 6. Landsstyret kan i bekendtgørelse fastsætte nærmere bestemmelser om bevilgning af støtte efter denne lov.

§ 7. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort, dog har § 1 gyldighed fra 1. januar 1994.

Viðmerkingar:

Á rakstrarstaði 18584 í fíggjarløgtingslóg fyri 1994 eru avsettar 20 mió. kr. Henda upphædd kemur partvís ístaðin fyri ta upphædd, sum í fíggjarárinum 1993 varð sett av til "Vørumenning og innflutning av fiski".

Ætlanin hjá landsstýrinum við stuðlinum til innflutning av fiski var at fáa gongd á virking av vørum úr 3. lands fiski fyri at skapa meira arbeiði í landinum. Stuðul til keyp av fiski úr útlondum varð latin sbrt. hesi skipan í 1992 og 1993. Skipanin má haldast at hava virkað eftir ætlan, men av tí at kappingin alsamt er harðnað, er avkastið hjá virkjunum av hesi framleiðslu

enn ikki nóg gott. Virking úr frystari rávøru setir eisini heilt serlig krøv til virkini. Sum støðan er, hevur Føroya landsstýri ikki stórar vónir um, at kappingarførið hjá vinnuni gerst betri, uttan at okkurt munadygt verður gjørt fyri at bøta um tað. Í staðin fyri at halda fram við stuðli til keyp av fiski heldur Føroya landsstýri tað tí vera rættari at stuðla menning av førleika til framleiðslu og sølu úr innfluttum fiski, so henda vinna sum skjótast kann koma at klára seg uttan stuðul. Hesin stuðul kann verða latin sambært líknandi reglum, sum hava verið galdandi fyri stuðul til vørumenning tey undanfarnu árini.

Herumframt er tað ætlan landsstýrisins, at økja um møguleikarnar fyri framleiðslu úr 3. lands fiski við at veita stuðul svarandi til ta toliverju, ið ES gevur sínum virkjum, ið virka úr somu vøru.

Viðvíkjandi stuðuli til vørumenning o.a., er tað ætlan landsstýrisins, at stuðulin í høvuðsheitum skal virka eftir somu reglum sum undanfarin ár. Stuðul, ið eftir hesi skipan varð ásettur sum %-partur av útflutningsvirðinum, er tó ikki ætlanin at veita. Dentur eigur at verða lagdur á verkætlanir, har arbeitt verður við heildarloysnum, í mótsetningi til t.d. bert framleiðsluspurningum, ella bert vørumenning.

Sambært lóg nr. 71 frá 13. mei 1992 um stuðul til arbeiðsskapandi tiltøk innan fiskivinnuna á landi, kapitrui 2 - stuðul til vørumenning, kundi stuðul bert verða latin til verkætlanir, hvørs endamál var at menna nýggjar vørur og at marknaðarføra hesar. Henda treyt er ikki við í lógaruppskotinum, og verður sostatt møguligt at stuðla verkætlanum, ið umboða framstig uttan at talan er um vøru, ið annars ikki (vanliga) verður framleidd í Føroyum. Ætlanin er tó ikki at slaka uppá krøvini um dygd í teimum verkætlanum, ið kunnu verða stuðlaðar, eins og landsstýrið ætlar at halda fast við, at stuðul ikki verður veittur til fleiri verkætlanir av sama slagi, uttan at tað greitt kann ávísast at grundarlag er fyri hesum.

Ætlanin er eisini, at møguleiki skal vera fyri at stuðla royndarverkætlanum, t.d. við virking burturúr ótraditionellum fiskasløgum. Kravið til slíkar verkætlanir eigur at vera, at arbeitt verður við øllum liðum í framleiðslu, menning og sølu.

1. viðgerð 22. mars 1994. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 15. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 22. mars 1994 beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir ein samd nevnd til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 21. apríl 1994. Uppskotið samtykt við 25-0 atkvøðum.

3. viðgerð 26. apríl. Málið varð beint aftur í figgjarnevndina, sum 28. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit II

Málið er eftir 3. viðgerð aftur beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd til í staðin fyri § 1 í uppskoti landsstýrisins samtykkja niðanfyri standandi broytingaruppskot. Orsøkin til, at fíggjarnevndin mælir til hesa broyting, er, at tað er uplýst frá sakkønum innan mentingarvirksemi, at mett verður, at lógin kemur at virka betur, um broytingin verður framd.

Broytingaruppskot

§ 1 í uppskoti landsstýrisins verður orðað soleiðis:

"§ 1. Heimilað verður landsstýrinum í fíggjarárinum 1994 at veita fiskavirkjum stuðul til keyp av 3. lands fiski, krabbadýrum og skeljadýrum til virkingar í Føroyum.
Stk. 2. Stuðulin kann játtast eftir umsókn, har allar týðandi upplýsingar um råvørukeypið og ætlaðu framleiðsluna eru hjálagdar. Játtast kann í mesta lagi 1,25 kr. fyri hvørt kg av fiski, krabbadýrum og skeljadýrum, ið innflutt verður.
Stk. 3. Stuðulin kann útgjaldast sambært skjalprógvum fyri innflutningi og útflutningi.".

§ 1 i landsstyrets forslag affattes således:

"§ 1. Landsstyret bemyndiges til i finansåret 1994 at yde fiskerivirksomheder støtte, der producerer varer af 3. lands fisk, krebsdyr og skaldyr til bearbejdelse på Færøerne.
Stk. 2. Støtten kan ydes efter ansøgning, hvor alle relevante oplysninger om råvarekøbet og den påtænkte produktion er vedlagt. Der kan højst bevilges 1,25 kr. for hvert kg fisk, krebsdyr og skaldyr, der importeres.
Stk. 3. Støtten kan udbetales i henhold til dokumentation for import og export.".

Framhaldandi 3. viðgerð 28. apríl 1994. Uppskotið soleiðis broytt endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

Lóg nr. 70 frá 10. mai 1994.

175 Løgtingslóg um partapening í framtaksfelag

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um partapening í framtaksfelag.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta upp til 9 mió. kr. í partapening í framtaksfelag. Framtaksfelagið verður skipað sum partafelag.
Stk. 2. Landsstýrið kann í mesta lagi eiga 30% av partapenninginum. Aðrir partaeigarar kunnu vera fíggjar- og peningastovnar, tryggingarfeløg, vinnufeløg o.o.

§ 2. Endamálið við framtaksfelagnum er at virka við til at fremja verkætlanir við stórum útflutningsvirði.

§ 3. Framtaksfelagið skal hava vinnuliga, virkisføra leiðslu. Leiðslan setur starvsfólk, sum kunnu geva serkøna hjálp til tær verkætlanir, felagið fer upp í.

§ 4. Framtaksfelagið kann seta pening í vinnuligar verkætlanir.
Stk. 2. Um peningur verður settur í vinnuligar verkætlanir skal framtaksfelagið geva ráð, veita nevndarlimir og veita vitan um øll neyðug viðurskifti í samband við fremjan av verkætlanini.
Stk. 3. Framtaksfelagið kann átaka sær at geva ráðgeving um vinnufremjandi skipanir í Føroyum og aðrastaðni, sum føroyskar vinnufyritøkur kunnu fáa lut í.

lagtingslov om aktiekapital i et venturеselskab.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at tegne aktier i et venturеselskab med et beløb på indtil 9 mio. kr. Venturеselskabet organiseres som et aktieselskab.
Stk. 2. Landsstyrets andel kan højst udgøre 30% av den samlede aktiekapital. Andre aktionærer kan være finansierings- og pengeinstitutter, forsikringsselskaber, foreninger for erhvervslivet m.m.

§ 2. Venturеselskabets formål er at medvirke i projekter med stor eksportværdi.

§ 3. Venturеselskabet skal have en erhvervsmæssig, professionel ledelse. Ledelsen kan ansætte personale der kan give specialist støtte til de projekter selskabet går ind i.

§ 4. Venturеselskabet kan sætte penge i erhvervsprojekter.
Stk. 2. Hvis der sættes penge i erhvervsprojekter skal venturеselskabet være rådgivende, levere bestyrelsesmedlemmer, og levere viden om alle forhold af betydning for udførelsen af projektet.
Stk. 3. Venturеselskabet kan påtage sig at give rådgivning om erhvervsfremmeordninger på Færøerne og andre steder, som færøske erhvervsforetagender har mulighed for at deltage i.

§ 5. Hendа lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 5. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:
Føroyska endurreisingarnevndin hevur hetta at siga um framtaksfeløg, venturefeløg:

Nevndin metir, at venture-feløg er tann mest realistiska skipanin. Eitt venture-felag kann skapa arbeiði og vinna pening.

Føroyski marknaðurin er eyðkendur við, at okkum trýtur karmar til formidling av eginkapitali, eins og føroysk virkir eru smá og tí kunnu hava torført við at savna nóg nógva vitan um t.d. leiðslu, teknikk, marknaðir, búskap og fígging. Av tí, at talan er um eitt øki við stórum váða, mælir nevndin til, at fíggingarstovnar, tryggingarfeløg, fakfeløg og tað almenna vísa veg á hesum øki við at seta á stovn eitt venture-felag við omanfyri nevndu pørtum sum luttakarum. Endamálið skal í fyrstu atløgu vera at fremja verkætlanir, ið hava eitt stórt útflutningsvirði. Vit hava nógvar verkætlaðir í Føroyum. Nakrar eru gamlar, ið enn hóra, aðrar ið enn ikki eru settar í gongd.

Ein professionell leiðsla er neyðug. Eitt tílíkt felag skal helst hava vælútbúgvin starvsfólk við drúgvum royndum á økinum. Hetta er sera avgerandi, skal ætlanin eydnast. Tey skulu ráðgeva, vera nevndarlimir og á annan hátt veita virkinum serliga vitan um fíggjarstýring, framleiðslu, útlendskar marknaðir, kontaktir o.a. Møguleikar skuldu verið at fingið fólk, ið hava arbeitt í øðrum venture-feløgum.

Skal ætlanin gerast veruleiki, krevjast eftir okkara meting einar 20-30 mió. kr. í stovnsfæi. Tað almenna kundi latið eini 30-40% av stovnsfænum. Restin kundi verið javnt býtt millum fakfeløg, peningastovnar, tryggingarfeløg o.o.

Felagið má ikki nýtast til "politisk" endamál, bygdamenning ella tílíkt, men til at kommercialisera nakrar fáar vinnuligar verkætlanir, ið kunnu geva okkum nøkur eftir okkara viðurskiftum stór íðnaðararbeiðspláss við einum stórum útflutningsvirði. Møguleiki skal vera hjá øðrum at kunna keypa partapening frá venture-felagnum. Venture-felagið fær soleiðis frígjørdan kapital til nýggjar ileggingar.

Áhugin hjá teimum, ið seta pening í, skal sjálvsagt vera, at vinningur skal spyrjast burturúr. Møguleikin fyri vinningi er størri hjá omanfyri nevndu luttakarum, tí ikki einans privatbúskaparligi vinningurin telur við. Samfelagsbúskaparliga árinið, t.d. tann fylgiíðnaður, ið kundi komið í gongd og tann vitan, ið verður skapt, kann harvið geva skattainntøkur til tað almenna, tryggingarinntøkur til tryggingarnar og rentur til peningastovnarnar. Sostatt er møguleikin fyri, at nakað positivt spyrst burturúr, stórur hjá hesum luttakarum.

Avgerandi er, at føroyingar leggja fram nakrar verkætlanir, ið eru áhugaverdar í hesum sambandi. Eitt venture-felag kann styrkja verkætlanir innan reiðskap og aðra útgerð til fiskiför, fiskivinnu og fiskaíðnað sum heild, so at nakrar framleiðslur koma burturúr, ið hava ein møguleika uttanlands.

Úrslitini hjá venture-felǿgunum í Danmark hava verið ymisk. Nøkur venture-felǿg fóru í áttatiárunum út í nýggjar og vandamiklar verkætlanir og mistu pening. Onnur hava fingið góð úrslit.

Annars verður vist til bls. 96 og 97 í frágreiðingini frá nevndini.

Landsstýrið er samt við nevndini í hesum metingum og leggur tí lógaruppskot um hetta fyri løgtingið.

1. viðgerð 22. mars 1994. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 17. mai 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 22. mars 1994 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen og Karl Heri Joensen) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Meirilutin vísir á, at eingin peningur er settur av til endamálið á fíggjarløgtingslógini fyri 1994 og heldur, at um ætlaða framtaksfelagið fer at virka í 1994, eigur landsstýrið at upptaka lán við veðhaldi frá Ábyrgdargrunninum, sum er stovnaður smb. løgtingslóg nr. 69 frá 10. mai 1994 um ábyrgdargrunn.

Landsstýrið eigur at seta upphæddina í fíggjarlógaruppskotið fyri 1995.

Møguliga veitta veðhaldið frá Ábyrgdargrunninum fer úr gildi, tá umrødda játtan á fíggjarlógini 1994 er útvegað.

Ein minniluti (Anfinn Kallsberg) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins. Fyriliggjandi uppskot er eitt av teimum, sum føroyska búskaparnevndin hevur skotið upp í sínum áliti.

Í staðin fyri at tora gera tað, ið neyðugt er fyri at fáa búskapin aftur á føtur, nevniliga at fáa kappingarføri aftur í føroyskt vinnulív, leypur man um garðin, har hann er lægstur, og byrjar aftur at játta almennan pening fyri at økja virksemið. Vit kunnu nýta so nógvan almennan risikopening, sum vit vilja, men lønsemi í vinnuni verður ikki betri av tí.

Tað, ið fólkaflokkurin ferð eftir ferð hevur vist á, nú fremjast, og fortreytirnar hjá vinnuni mugu broytast soleiðis, at hon aftur gerst lønandi. Gera vit tað, so er hvørki neyðugt við almennum partapeningi ella almennum lánum, tí tá eru fíggingarmøguleikar.

Ein annar minniluti (Flemming Mikkelsen) hevur hesar viðmerkingar:

Viðvíkjandi lóg um partapening í framtaksfelag, har landsstýrinum verður heimilað at seta

upp til 9 mió. kr. í partapeningi, og hvørs endamál er at virka við til, at fremja verkætlanir við stórum útflutningsvirði, kann minnilutin í prinsippinum taka undir við.

Viðmerkingarnar til málið eru ein beinleiðis endurtøka av tí, endurreisingarnevndin førir fram í áliti sínum, har m.a. verður lagt um til, at sett verður ein "professionell" leiðsla við víttgangandi heimildum.

Hetta ber brá av einum kostnaðarmiklum heil- ella hálvalmennum stovni undir uppsigling.

Um ein slík professionell leiðsla er so alneyðug, loyvi eg mær at ivast í, vit hava sum er menningarstovuna við 2,2 mió. kr. á fíggjarlógini, vit hava møgulcika at keypa serkøna hjálp um neyðugt.

Minnilutin heldur, at tað kann ikki vera rætt at seta almennan partapening, sum ikki er tøkur á verandi fíggjarlóg, í nevnda felag, og mælir tí til, at málið verur útsett og tikið upp til nýggja viðgerð, um so er, at peningur er tøkur á eini komandi fíggjarlóg.

Hin triði minnilutin (Tórður J. Niclasen) førir fram:

Talan er um stovnsetan av framtaksfelagnum, har tað almenna í mesta lagi kann eiga 30% av partapeninginum - ella upp til 9 mió. kr.

Hetta tiltak má metast av týdningi fyri at økja um fortreytirnar fyri vinnuligum virksemi, sum í hesum døgum so harðliga er tiltrongt. Hetta er eisini niðurstøðan hjá føroysku endurreisingarnevndini, sum m.a. beinleiðis mælir til nevnda tiltak, sum kann økja munandi um útflutningsvirðið og styrkja samfelagsbúskapin.

Minnilutin er sannførdur um, at nevnda tiltak hevur arbeiðsskapandi týdning og tekur tí undir við uppskotinum.

2. viðgerð 19. mai 1994. Uppskotið samtykt við 20-0 atkvøðum.

3. viðgerð 19. mai 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 19-3 atkvøðum.

Lóg nr. 84 frá 31. mai 1994.

176 Góðkenning av Espoo-sáttmálanum um meting av árinum á umhvørvið yvirum landamørk

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Signar á Brúnni, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna, at Espoo-sáttmálin um meting av árinum á umhvørvið yvirum landamørk verður settur í gildi í Føroyum.

Viðmerkingar:

Sáttmálin varð undirskrivaður í Espoo í Finnlandi tann 25.-27. februar 1991 av 27 londum, herundir av teimum 12 EU-londunum og EU-nevndini. Sáttmálin fær sambært artikkul 18 í sáttmálanum gildi 90 dagar eftir, at 16 lond hava fráboðað, at tey hava góðkent sáttmálan. EU-nevndin og tey 12 EU-londini hava ikki enn fráboðað hesa góðkenning (ætlanin er, at hetta skal fara fram í senn, helst einaferð í heyst), og sáttmálin hevur sostatt ikki enn fingið gildið.

Uppskotið til Espoo-sáttmálan er gjørt av einum arbeiðsbólki undir búskaparligu nevndini fyri Europa hjá Samendu Tjóða (ECE), har bæði nevndin og limalondini hava luttikið.

Í artikkul 2, eru ásettar tær meginreglur, sum sáttmálapartarnir binda seg til at halda. Her kann nevnast:

at forða fyri, minka og ansa eftir týðilig skaðaárin á umhvørvið tvørtur um landamørk (stk. 1),

at tryggja at, innlendis lóggávan krevur, at skjalprógvað meting verður gjørd av ætlaðum tiltøkum nevnd í fylgiskjali 1, sum kunnu hugsast at hava týðilig skaðaárin á umhvørvið tvørtur um landamørk (stk. 2),

at tryggja, at hendan meting verður gjørd, áðrenn loyvi verður givið til tiltakið (stk. 3), t.e. sambært stk.7 longu á projekteringsstigi. Hvussu hendan meting skal skjalprógvast og hvat hon skal umfata, verður nærri ásett í ávikavist artikkul 4 og fylgiskjali 2, og

at lond, sum kunnu verða ávirkaði av tiltakinum verða kunnaði um ætlaða tiltakið (stk. 4). Hetta er nærri greinað út í artikkul 3.

Reglurnar í sáttmálanum forða sambært artikkul 2, stk. 9 ikki fyri, at partarnir hvør í sínum lagi hava strangari reglur enn ásett í sáttmálanum.

Aftaná at skjalprógvanin er fingin til vega skal sambært artikkul 5 samráð verða milluni landið, sum dálkar, og tað ella tey lond, sum verða ávirkaði av dálkingini, og skal úrslitið av hesum samráði saman við gjørdu umhvørvismetingini sambært artikkul 6 viga við, tá endalig avgerð verður tikin um at loyva tiltakinum.

Um eitt av londunum sum dálkar ella verður dálkað krevur tað, skal sambært artikkul 7 ein meting eisini gerast av árininum av dálkinigini aftaná, at tiltakið er sett í gongd.

Haraftrat eru reglur um gransking (artikkul 9), fundir millum partarnar í sáttmálanum (artikkul 11), atkvøðugreiðslu (artikkul 12), skrivstovu (sum skal vera ECE-skrivstovan), umframt reglur um trætuloysn, broyting av sáttmálanum, gildiskomu, v.m.

Landsstýrið metir, at ásetingarnar í sáttmálanum kunnu lúkast innanfyri karmarnar av galdandi løgtingslóg um umhvørvisvernd.

Heilsufrøðiliga Starvstovan mælir til, at sáttmálin eisini kemur at umfata Føroyar.

Vísandi til omanfyristandandi mælir landsstýrið løgtinginum til at samtykkja uppskotið um at seta Espoo-sáttmálan í gildi fyri Føroyar.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í umhvørvisnevndina, sum 15. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð beint í umhvørvisnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og tekur **ein samd nevnd** undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 21. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

FL jnr. 2750-9/91.

177 Løgtingslóg um búskaparráð

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um búskaparráð.

§ 1. Landsstýrið skipar búskaparráð at fylgja við búskaparligu gongdini í landinum. Ráðið skal í minsta lagi tvær ferðir um árið gera frágreiðingar um gongdina í føroyska búskapinum, har mett verður um búskaparligu støðuna, útlitini framyvir og hvørji tiltøk eiga at verða framd.

§ 2. Ráðið hevur 3 limir, ið skulu hava útbúgving sum búskaparfrøðingar. Limirnir mugu ikki hava leiðandi starv innan miðfyrisitingina, og mugu ikki umboða seráhugamál í dagliga starvi sínum. Valskeiðið er 3 ár.

§ 3. Ráðið hevur rætt til at krevja allar upplýsingar og frágreiðingar frá almennum stovnum, sum tað metir neyðugar fyri at kunna røkja virki sítt.
Stk. 2. Limirnir í ráðnum hava tagnarskyldu við tí teir fáa at vita sum limir í ráðnum og sum eftir síni náttúru ikki eigur at verða borið víðari.

§ 4. Samsýning til ráðslimirnar skal góðkennast av landsstýrinum. Dagliga umsitingin hjá ráðnum liggur hjá Hagstovu Føroya.

§ 5. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um starv ráðsins.

§ 6. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om økonomisk råd.

§ 1. Landsstyret nedsætter et økonomisk råd til at følge med i landets økonomiske udvikling. Rådet skal mindst to gange årlig udarbejde rapporter om udviklinger i den færøske økonomi, hvor den økonomiske situation og udsigterne fremover vurderes, og hvilke tiltag der bør iværksættes.

§ 2. Rådet har 3 medlemmer, der skal have uddannelse som økonomer. Medlemmerne må ikke være ansat i ledende stillinger i centraladministrationen og må ikke repræsentere særinteresser i sin daglige stilling. Valgperioden er 3 år.

§ 3. Rådet har ret til at kræve alle oplysninger og redegørelser fra offentlige institutioner, som det anser for nødvendige for at kunne varetage sit hverv.
Stk. 2. Rådets medlemmer har tavshedspligt med det, som de som medlemmer bliver bekendt med og som efter sin natur ikke bør bringes videre.

§ 4. Vederlag til rådets medlemmer skal godkendes af landsstyret. Den daglige administration af rådet ligger hos Færøernes Statistik.

§ 5. Landsstyret kan fastsætte nærmere bestemmelser om rådets virksomhed.

§ 6. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Við uppskotinum ynskir landsstýrið at stovna eitt nýtt búskaparráð, ið skal vera óheft av landsstýrinum. Landsstýrið heldur tað vera av stórum týdningi at fáa regluligar og óheftar frágreiðingar frá føroyskum búskapartreðingum, bæði um gongdina í føroyska búskapinum og um hvørji tiltøk eiga at verða sett í verk.

Viðmerking til § 2:
Limirnir skulu hava útbúgving sum búskapartreðingar á akademiskum støði.

Verandi búskaparráð er mannað við fólki frá miðfyrisitingini. Landsstýrið heldur tað vera rættast, at limir búskaparráðsins eru óheftir av politiskum myndugleikum og ymsum seráhugamálum, t.d. politiskum flokkum, fakfeløgum, arbeiðsgevarafeløgum, bankum og øðrum størri fyritøkum.

1. viðgerð 22. mars 1994. Málið verður beint í fíggjarnevndina, sum 20. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur landsstýrismaðurin í búskaparmálum, Finnbogi Ísakson, verið á fundi og givið fíggjarnevndini upplýsingar.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meirilluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen og Karl Heri Joensen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til at samtykkja tað.

Ein minniluti (Anfinn Kallsberg og Tordur J. Niclasen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins, tá henda lógin als ikki fæst at virka, og tí at kostnaðurin av tí, sum veruliga liggur í uppsktinum, verður ómøguligur at meta um. Landsstýrið eigur tí heldur at bøta um ta skipan, ið vit hava í dag. Sum nú er tað fíggjarstjórin í Tinganesi, landsbankastjórin, stjórin á hagstovuni, sum manna búskaparráðið. Hesir sita í fíggjarligu lívsæðrum í Føroynum og skuldu havt allar møguleikar at fylgt við øllum, sum fer fram á hesum øki. Sambært § 1 skal ráðið minst tvær ferðir um árið geva frágreiðingar um gongdina í føroyska búskapinum, har mett verður um búskaparligu støðuna. Verandi búskaparráð skuldi havt allar møguleikar at framt hetta. Viðvíkjandi seinna partinum í § 1 um "útlitini framyvir og hvørji tiltøk eiga at verða framd" eigur eitt annað forum at verða tikið við. Her er tað fyrst og fremst vinnan, fakfeløg og peningastovnar, ið eiga at verða tikin við. Tí verur mælt til, at sett verður eitt búskaparsamskipannarráð, sum skal ráðgeva politisku myndugleikunum um framtíðartiltøk.

Út frá hesum setir minnilutin fram soljóðandi:

U p p s k o t

til

samtyktar

Føroya Landsstýri velur búskaparsamskipannarráð, umboðandi vinnufeløgini, verkafeløgini og peningastovnarnar, sum saman við verandi búskaparráð skulu meta um útliti framyvir og ráðgeva, hvørji tiltøk eiga at verða framd.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum fall við 7-0 atkvøðum. Uppskotið samtykt við 17-0 atkvøðum.

3. viðgerð 27. apríl 1994. Málið varð beint aftur í fíggjarnevndina, sum 17. mai 1994 legði fram soljóðandi

Álit II

Málið varð undir 3. viðgerð 27. apríl 1994 aftur beint í fíggjarnevndina.

Í skrivi dagf. 26. apríl 1994 hevur Hagstova Føroya gjørt vart við kostnaðarspurningin, um fyriliggjandi lógaruppskot verður samtykt.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Finnbogi Ísakson, hevur á fundi við fíggjarnevndina upplýst, at tá lógin er samtykt og sett í verk, má ein meting gerast um kostnaðin og um neyðugt seta pening av á komandi fíggjarlóg.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Heini O. Heinesen og Karl Heri Joensen) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg, Tordur J. Niclasen og Flemming Mikkelsen) vísir til viðmerkingar teirra í áliti I. dagf. 20. apríl 1994.

Framhaldandi 3. viðgerð 19. mai 1994. Uppskot landsstýrisins fall við 14-0 atkvøðum.

FL jnr. 2513-4/94.

178 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 77, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"**Stk. 3.** Avlopsskattur, ið skattgjaldari fær eftir § 79, verður mótroknaður í frestandi skatti skattgjaldarans og frestandi skatti hjá hjúnafelaga skattgjaldarans, sum verður álagdur hjúnafelaganum eftir § 78, hóast frestandi skatturin ikki er fallin til gjaldingar, um skatturin hevur sín uppruna frá skattaskeiði, tá hjúnini vórðu skattað saman."

2) Í § 79 verður aftaná stk. 4 sum nýtt stk. 5 sett:
"**Stk. 5.** Mótrokning eftir stk. 3 kann verða gjørd hjá hjúnafelaga skattgjaldarans, um skattaeftirstøðan hevur sín uppruna frá skattaskeiði, tá hjúnini vórðu skattað saman."
Stk. 5 verður hereftir stk. 6.

3) Í § 80 verður stk. 4 orðað soleiðis:
"**Stk. 4.** Mótrokning eftir stk. 3 kann verða gjørd hjá hjúnafelaga skattgjaldarans, um skatturin hevur sín uppruna frá skattaskeiði, tá hjúnini vóru skattað saman."

4) Í § 80 verður stk. 5 orðað soleiðis:
"**Stk. 5.** Um ein broytt endalig álíkning, sum er gjørd aftaná 1. mai í álíkningarárinum, gevur tað úrslit,

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 77, stk. 3 affattes således:
"**Stk. 3.** Overskydende skat, der tilkommer en skatteyder i henhold til § 79, modregnes i skatteyderens restskat og i restskat hos skatteyderens ægtefælle, der pålægges ham i henhold til § 78, selv om restskatten er uforfalden, hvis skatten stammer fra en tidsperiode, hvor ægtefællerne har været sambeskattede."

2) I § 79 indsættes efter stk. 4 som nyt stk. 5:
"**Stk. 5.** Modregning i henhold til stk. 3 kan ske hos skatteyderens ægtefælle, hvis skatten stammer fra en tidsperiode, hvor ægtefællerne har været sambeskattede."
Stk. 5 bliver herefter stk. 6.

3) I § 80 affattes stk. 4 således:
"**Stk. 4.** Modregning i henhold til stk. 3 kan ske hos skatteyderens ægtefælle, hvis skatten stammer fra en tidsperiode, hvor ægtefællerne har været sambeskattede."

4) I § 80 affattes stk. 5 således:
"**Stk. 5.** Medfører en ændret slutopgørelse, som foretages efter 1. maj i slutligningsåret, at der fremkommer overskydende skat eller yderligere

at avlopsskattur skal gjaldast í skattskylduga, ella at meira avlopsskattur enn frammanundan roknað skal afturgjaldast, verður upphæddin afturgoldin við endurgjaldi eftir § 79, stk. 3 og møguligum rentum eftir § 79, stk. 4 innan mánaðarin, sum kemur aftaná útskrivingardagin, er úti. Áðrenn afturgjalding verða møgulig gjøld av írestandi skatti, sum ikki eru fallin til gjaldingar eftir § 78 og møguligar eftirstøður av persónligum skatti og tilskrivaðar rentur mótroknaðar."

5) Í § 80 verður stk. 6 orðað soleiðis:
"**Stk. 6.** Mótrokning eftir stk. 5 kann verða gjørd hjá hjúnafelaga skattgjaldarans, um skatturin hevur sín uppruna frá skattaskeiði, tá hjúnini vóru skattað saman."
Stk. 5 verður hereftir stk. 7 og óbroytt.

6) Í § 135, stk. 3 verður sum 2. pkt. sett:
"Tó verður stk. 1 í § 7 í "Lov nr. 85 af 30. marts 1935 for Færøerne om inddrivelse af skatter og afgifter til det offentlige m.m." ikki at gjalda."

overskydende skat end tidligere beregnet, tilbagebetales beløbet med godtgørelse efter § 79, stk. 3 og eventuelle renter efter § 79, stk. 4 inden udgangen af den måned, der følger nærmest efter udskrivningsdato. Forinden tilbagebetaling modregnes eventuelle restancer af personlig skat og påløbne morarenter."

5) I § 80 affattes stk. 6 således:
"**Stk. 6.** Modregning efter stk. 5 kan ske hos skatteyderens ægtefælle, hvis skatten stammer fra en tidsperiode, hvor ægtefællerne har været sambeskattede."
Stk. 5 bliver herefter stk. 7 og ændret.

6) I § 135, stk. 3 indsættes som 2. pkt.:
"Dog finder stk. 1 i § 7 i lov nr. 85 af 30. marts 1935 for Færøerne om inddrivelse af skatter og afgifter til det offentlige m.m. ikke anvendelse."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Mótrokning millum hjún:
Ætlanin við fyriliggjandi uppskoti er at broyta skattalógina soleiðis, at møguleikarnir fyri at mótrokna millum hjún, ið eru samskattað sambært §4, stk. 1 í skattalógini, verða víðkaðir.

Heimildin at mótrokna millum hjún er, soleiðis sum skattalógin nú er orðað, heldur ógreið, og landsstýrið ynskir við uppskotinum at útvega eina greiða heimild at krevja skatt inn við mótrokning, har annar hjúnafelagin fær avlopsskatt og hin írestandi skatt.

Sum støðan er í dag, kunnu hjúnafelagar flyta renturnar sínámillum, soleiðis at annar hjúnafelagin fær renturnar í fyribilsskránni og hin í endaálíkningini. Harvið fær annar hjúnafelagin frestandi skatt, meðan hin fær avlopsskatt. Um tann hjúnafelagin, sum fær frestandi skattin, frammanundan hevur ilt við haida skyldur sínar, so missur landskassin allan tann frestandi skattin. Hjúnini hava á hendá hátt møguleika fyri lítlan og ongan skatt at gjalda.

Landskassin er sostatt í vanda fyri at missa munandi upphæddir orsaka av slíkum snildum, um ikki ein greiðari heimild fæst til vega.

Mótrokning millum avlopsskatt og ikki falnan frestandi skatt:
Í hesi broyting verður skotið upp, at avlopsskattur verður mótroknaður í frestandi skatti skattgjaldarans, hóast frestandi skatturin ikki er fallin til gjaldingar.

Landskassin hevur, sum er, bert í einstøkum førum heimild at mótrokna millum avlopsskatt og ikki falnan frestandi skatt. Hetta ger, at skattgjaldari, ið skyldar frestandi skatt, sum ikki er fallin til gjaldingar, kann fáa ein avlopsskatt útgoldnan táar dagar áðrenn frestandi skatturin fellur til gjaldingar. Landskassin hevur í fleiri førum misst pening uppá, at skattgjaldarar hava fingið útgoldið avlopsskatt, og seinni ikki vilja/kunna goldið frestandi skattin.

Reglur um panting av skattaskuld:

Skattakrøv verða sum meginregla fyrnað eftir fimm árum. Freistin at panta er hinvegin tvey ár.

Er pantifreistin farin, er neyðugt at fara í rættin at fáa dóm fyri kravið. Hetta hevur munandi støðri útreiðslur við sær, og ger innkrevjingina truplari og minni effektiva.

Skotið verður tí upp at leingja freistina soleiðis, at hon fylgir fyrningarfreistini.

1. viðgerð 22. mars 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð beint í skattanevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Lasse Klein, Jacob Lindenskov, Heini O. Heinesen og Finnbogi Arge) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Ein minniluti (Jógvan Sundstein) tekur ikki undir við pkt. 4, tá tað má kallast at vera rættarbrot at tvingsilsmótrokna ikki forfaldna skuld.

Minnilutin setir annars fram hetta

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum í ólavsøkutingsetuni 1994 at leggja fyri løgtingið lógarreglur um, at hjúnafelagin, har bæði arbeiða í felags virki, verða skattað hvør sær.

2. viðgerð 15. apríl 1994. Minnilutauppskotið fall við 15-0 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins samtykt við 22-0 atkvøðum.

3. viðgerð 21. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 21-0 atkvøðum.

FL jnr. 2540-5/91.

Lóg nr. 63 frá 10. mai 1994.

179 Sethúsaskuldin

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Niels Pauli Danielsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum beinanvegin at taka upp samráðingar við peningastovnar, grunnar og donsku stjórnina um fígging til at avskriva og niðurfrysta skuld hjá sethúsaeigarum, so at fólk hava møguleika til at verða verandi í húsum sínum.

Viðmerkingar:

Tann skalvur, sum leyp hin 6. oktober 1992, tá ið bankarnir fóru á húsagang og máttu verða hjálptir, er nú við miklari ferð komin til sethúsini og hóttir við at taka grundarlagið undan so mongum heimum, tí at einki munagott er gjørt fyri at steðga neyðini hjá fólki. Nøkur eru longu farin frá húsi og heimi.

Bankarnir eru bjargaðir, og landskassin fær umskipaað lán sini og tekur nýggj lán. Eftir stendur at bjarga heimunum og fáa fólkið í vinnu aftur.

Landsstýrið eigur nú einsamalt bankarnar og Húsalánsgrunnin og aðrar grunnar við. Hesir eiga saman við landsstýrinum at ásanna, at stórur partur av lánunum í sethúsunum er mistur og má verða avskrivaður sum tap, so at fólk fáa møguleikan at fóta sær og verða verandi í húsum sínum.

Tað ber ikki til, at fólkið skal skuldbindast fyri at bjarga bankunum og landskassanum og missa síni egnu hús.

Tíðin er komin til at sláa mannagarð um heimini og verja familjuna. Fara heimini, fer landið eisini.

1. viðgerð 22. mars 1994. Málið verð beint í figgjarnevndina, sum 15. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirluta og tveir minnilutar.

Meirlutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen, Karl Heri Joensen og Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram. Meirlutin vísir á uppskot landsstýrisins í løgtingsmáli nr. 83/93: Broyting í løgtingslóg um húsalánsgrunn og á álit figgjarnevndarinnar í sama máli.

Ein minniluti (Anfinn Kallsberg) hevur hesar viðmerkingar: Løgtingsmál nr. 130/93: "Yvirtøka av lánunum í Húsalánsgrunninum soleiðis, at grunnurin kann viðgera sethúsalánini við støði í gjaldsmøguleikum hins einstaka." er lagt fram av Bjarna Djurholm, og verður víst til viðmerkingarnar í hesum máli.

Ein annar minniluti (Tordur J. Niclasen) tekur undir við fyriliggjandi uppskoti og mælir til at samtykkja tað.

2. viðgerð 22. apríl 1994. Uppskotið fall við 6-0 atkvøðum.

180 Javnbjóðis skatting av hjúnum og støkum

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri tingið á ólavsøku uppskot um broyting í skattalógini, so at hjúnafelagar verða skattaðir hvør sær av helminginum av samlaðu inntøkuni hjá báðum hjúnafeløgunum.

Viðmerkingar:

Uppskotið miðar ímóti at býta inntøkuna hjá hjúnum, har bert annað teirra hevur lønararbeiði, sundur í tvær skattskyldugar inntøkur, so hjún við bert tí eini inntøkuni verða skattliga javnstillað hjúnum ella samlivandi persónum, sum hevur tvær inntøkur.

Eisini verður hetta uppskotið ein skattligur lætti hjá hjúnum, har annar hjúnafelagin hevur stóra og hin lítla inntøku.

Uppskotið er í tráð við fólkafloksins uppskot nr. 78/93 um endurreisn av búskapinum, lækking av kostnaðarstøði, lækking av skattastiganum og bruttoskatting.

Verandi skattaskipan hevur m.a. tann innbygda órætt í sær, at húsarhald við einari inntøku verða harðari skattað enn húsarhald, har tvey eru um at forvinna inntøguna.

Til dømis ber ein inntøka upp á 200.000 kr. 95.000 kr. í skatti, meðan tvær inntøkur upp á 200.000 kr. tilsamans bert verða skattaðar 75.000 kr. samanlagt. Sostatt verða hjúnini, har bert annað er í løntari vinnu og tjenar 200.000 kr. skattað 20.000 kr. harðari, enn har báðir hjúnafelagarnir forvinna 100.000 kr. í part.

Hetta dømi kann eisini skiljast so, at hjún, har bæði arbeiða, kunnu forvinna 240.000 kr. tilsamans (120.000 kr. í part), áðrenn tey verða skattað líka hart, nevniliga 95.000 kr., sum tann eina inntøkan upp á 200.000 kr.

Fara vit hægri upp í inntøku- og skattastigan, t.d. 300.000 kr. í einari mótvegis tveimum inntøkum, verður mannamunurin móti húsarhaldinum við einari inntøku enn lítari.

Harumframt veitir hitt almenna barnafamilju, har bæði arbeiða úti, t.d. barnaansing, sum kostar hinum almenna umf. 40.000 kr. um árið pr. barn á stovni. Men hjún, har annar hjúnafelagin arbeiðir heima, fáa ikki líknandi sømdir og verða fyri fíggjarligum vanbýti av at ansa sínum egnum børnum. So her gerst almenna diskrimineringin móti barnafamiljum við einari inntøku enn størri.

Henda skattliga diskriminering móti familju við bert einari inntøku merktist minni meint tey villu 80-árini, tá tíðarandin lokkaði og hekkandi gjaldsskyldur til skatt og hús noyddu báðar hjúnarfelagarnar úr heiminum út á arbeiðsmarknaðin, har ovmikið var fyri allar hendur.

Men nú eru tíðirnar broyttar. Hjá hundraðtals familjum eru báðar lønarinntøkurnar avloystar av tveimum lágum arbeiðsloysisgjøldum. Hjá túsundtals hjúnum er onnur inntøkan burtur, so livast má av lægri (samlaðari) inntøku, men skatturin er hækkaður.

Hetta uppskotið hevði, umframt at innføra eitt sjálvsagt rættvísi í skatting av familjuinntøkum yvirhøvur, eisini ført til, at hjún, ið hava mist aðra inntøkuna, sluppu meir rímiligt í skatti enn nú. Tað kundi stuðlað foreldrum til, at annað valdi at abeiða heima undir uppvøkstrinum hjá børnunum soleiðis, at tað varð nakað rúmligari á arbeiðsmarknaðinum. Tað kundi givið unkrum, sum er trokaður út í arbeiðsloysi, høvi aftur at sleppa í lønta vinnu.

Landskassin hevði mist nakrar 10 mió. kr. í inntøku upp á stutt sikt, men av tí, at tað alt ov høga skattatrýstið og tann alt ov stóri almenni sektorurin er mesta ávoldin til, at búskapur og samfelag okkara eru sjúk, verður ein lægri landskassainntøka bert til frama fyri samfelagið sum heild.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 12. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Lasse Klein, Jacob Lindenskov og Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Ein minniluti (Jógvan Sundstein og Finnbrgi Arge) mælir løgtinginum til at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

2. viðgerð 22. apríl 1994. Uppskotið fall við 12-0 atkvøðum.

181 Trygging av realløni og av útgoldnu løni

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum til framløgu á ólavsøku at broyta skattalógina við gildi frá 1. januar 1995, tá útroknaði skatturin verður lækkaður 40% og útgoldnu lønirnar samsvarandi soleiðis, at skattalættin fultút dekkar lønarlækkingina, og lønmóttakarin fær somu løn sum nú í krónum og oyrum og varðveitir harvið reallønina.

Viðmerkingar

Hetta uppskotið til samtyktar miðar ímóti:

1. At tryggja øllum løntakarum reallønina. Tað merkir, at tann upphædd, sum er eftir av útgoldnu løni, verður tann sama sum higartil, eftir at skatturin er lækkaður í sama mun, sum útgoldna lønin lækkar. Sostatt verður løn bert lækkað tað, sum full mótrokning fæst fyri í skattinum. (Nakað sama skipan hevur so heppið bjargað norðurlendsku farmaskipunum við FAS, DIS, NIS).

2. At minka skattainntøkur og lønarútreiðslur hjá landi og kommunum. Men í tann mun, sum virksemið í samfelagnum økist sum úrslit av tí bøtta kappingarførinum av hesum uppskoti, økjast almennu inntøkurnar aftur, meðan útreiðslurnar til almannamál falla tilsvarandi.

3. At bøta lønsemi og kappingarføri hjá vinnulívinum, av tí at virksemi, sum nú er niðurlagt av ov høgum kostnaðarstøði, aftur loysir seg. Við bøttum lønsemi økist eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi, fleiri fólk koma aftur í vinnu, og arbeiðsloysið minkar.

4. At lækka príslagið í samfelagnum, sum ger, at reallønin fer upp; at eftirspurningur og nýtsla, t.e. livistøðið, økist; at íløgurnar økjast, at innflutingurin minkar í tann mun, heimaframleiddar vørur verða meir kappingarførar við innfluttar vørur; at útflutingurin økist í tann mun, fiskavirki kunnu framleiða vørur við hægri útflutningsvirði.

Hetta uppskot er í tráð við ta niðurstøðu, sakkøna nevndin, sett av landsstýrinum í 1989/90, kom til í áliti sínum um lækking av kostnaðarstøðinum. Í nevndini sótu Petur Alberg Lamhauge, skattastjóri, Jógvan Joensen, statsg. gransknoðari, Sigurd Poulsen, landsbankastjóri, Bjarni Olsen, leiðari á Hagstovuni og Christian Andreassen, løgfrøðingur.

Ein fyritreyt fyri, at tiltakið við niðurlaðing av kostnaðarstøðinum skal virka eftir vild, helt nevndin, mátti vera eitt ávíst arbeiðsloysi. Jú størri arbeiðsloysið var, jú meir kundi

kostnaðarstøðið lækkast. Tískil er væntandi, at verandi ógvusliga arbeiðsloysið nú í Føroyum ger, at tilmæli um kostnaðarlækking fær serstakliga positiv úrslit á búskaparstøðuna í øllum liðum, hjá tí einstaka, hjá vinnuni og hjá tí almenna. Hóttafallið nú merkir eisini, segði nevndin, at tað bøtta kappingarførið orsakað av kostnaðarlækkingini verður lættari at varðveita við tíðini.

Uppskotið er eisini í tráð við uppskotið hjá Kjartan L. Kristiansen bólkinum, sum legði fram álit í apríl 1993.

Somuleiðis liggur hetta uppskot tætt upp at fleiri uppskotum fólkafloksins, t.d. sum minnilutaálit í tíggjarnevndini til løgtingsfíggjarlóg 1994 og uppskot nr. 78/93, sum bæði hava til endamáls at endurreisa føroyska búskapin á einum heilsubetri og tryggari støði.

Fleiri mátar eru at lækka kostnaðarstøðið. Hin lættasti er hesin, kallaður Møguleiki B í álitinum frá 23. apríl 1990 hjá sakkønu nevndini, tí hann ger tað óneyðugt við lóg at broyta avtalurnar á arbeiðsmarknaðinum. Eisini tryggjar hann, at tann útgoldna lønin hjá øllum løntakarum eftir sáttmála verður júst tann sama sum higartil. Hin vegin hevur hesin hátturin at lækka kostnaðarstøðið ikki við sær tann bruttoskatt, sum er neyðugur til at sleppa undan progressivum marginalskatti (ið nú er skaðilig 76%, hin hægsti í vesturheimi). Tí sama skattaprosent av fyrstu sum síðst forvunnu krónu er lívsneyðug fyritreyt fyri at eggja virkishugin hjá fólki. Men hin vegin forðar hesin "møguleiki B" ikki fyri seinni iverkseting av t.d. 20-30% bruttoskatti.

Tað bøtta kappingarførið fær alstóran týdning fyri fiskavirkini, fiskiskipini, alivinnuna og heimamarknaðarvirki. Vánaligt avkast í vinnuni í mong ár er eitt høvuðsatvold til kreppuna. Útrokningar hjá nevndini vísa, at samlaða nettoúrslitið hjá øllum vinnuvirkjum í landinum í 1988 var bert 680 mió. kr. Tað er nógv lægri nú. Ein 40% kostnaðarlækking hevði eftir 1988-tølunum bøtt nettoúrslitið upp í 1.600 mió. kr. árliga. Tí má lønsemið, vinningurin hjá vinnulívinum upp. Tað er tí, samfelagið lívir av, og ikki av landskassanum. Framleiðslu- og handverksvinnan, ið kappast við innfluttar vørur, fáa stóran fyrimun av uppskotnu kostnaðarlækkingini. Ein útrokning vísir, at samfelagið samanlagt megnar at torrenta umt. 10 mia. kr. í íløgum og lánfígging mót bert 3 mia. kr. við verandi kostnaðarstøði.

Fyri tænastuvinnuni o.a. vinnur, ið ikki kappast við innfluttar vørur, hevur niðursetingin helst ongan týdning fyri kapping móti útlandinum, men hevur fyrst og fremst við sær eina avlopsøking fyri vinnurnar. Henda avlopsøking verður møguliga útjavnað seinni av prislækkingum, sum koma føroysku brúkarunum av føroyskum tænastum tilgóða. Meir fæst av tænastum (eins og føroyskt framleiddum vørum) fyri somu pengar, og tað er einstýðandi við reallønarbatar hjá løntakarum.

Niðurlaðingin av kostnaðarstøðinum kann sostatt undir røttu umstøðunum hava við sær útflutningsøking og innflutingsminking. Sakkøna nevndin leggur áherðslu á, at niðurseting við fullari mótrokning í skattinum uttan iva hevur við sær eitt ávíst prísfall og harvið eina økta tøka realløn hjá fólki. Nýtslan kann tískil væntast at økjast. Somuleiðis roknar nevndin við, at íløgurnar í samfelagnum verða størri.

Hetta uppskot tryggjar útgoldnu lønina og reallønina við eini niðurlagðing av kostnaðarstøðinum. Landskassin ber alla avleiðingina av kostnaðarlækkingini við minni skattainntøku

í fyrsta umfari. Men løntakarin fær somu lønarútgjalding sum higartil og fullan lønardekning við minni skatti. Kostnaðarlækkingin hevur somu fyrimunarligu ávirkan á búskapin sum onnur lond við sjálvstøðugum gjaldoyra fáa av einari devaluering. Men samfelagið fær mótsett eini devaluering einki ógagn av hesum tiltaki, bert fyrimunir.

Skatta- og lønartekniskt virkar hetta uppskot á tann hátt, at ongar broytingar verða gjørdar í galdandi avtalum á arbeiðsmarknaðinum.

Arbeiðsgevarar upplýsa ta samlaðu A-inntøkuna (100%) fyri skattavaldinum, men útgjalda eina upphædd, ið svarar til samlaðu A-inntøkuna minus lækkingina, 40%.

Skattaútrokningin verður bygd út soleiðis, at eftir at skatturin er útroknaður eftir núgaldandi skattastiga, verður hann minkaður við tí krónutali, ið verður tikið burtur av A-inntøkuna, áðrenn hon verður útgoldin.

Sum dømi kann nevnast, at ein løntakari fær eina lønarútgjalding upp á 10.000 kr., og at hann eftir galdandi reglum skal gjalda 5.000 kr. í skatti.

Eftir hesari skipan skal arbeiðsgevari seta 10.000 kr. á lønarseðilin sum A-inntøku, draga 40% ella 4.000 kr. av, so forvunna upphæddin verður 6.000 kr. Skatturin verður roknaður út sum nú, tó við tí munі, at hann verður lækkaður við lønarlækkingini. Skatturin verður tí í hesum føri 5.000 kr. - 4.000 kr. = 1.000 kr.

Tað merkir, at løntakarin fær júst somu 5.000 kr. útgoldnar í nettoløn eftir skatt sum eftir verandi skipan. Landskassin fær bert 1.000 kr. í skattainntøku í staðin fyri 5.000 kr. sum nú, men sparir eisini tær 4.000 kr. í minni lønarútreiðslum til (almenn setta) løntakaran.

Í sjálvari skattaútrokningini er galdandi skattahámark 57%, men eftir at skattalækkingin er gjøgnumførd sambært hesum uppskoti, verður skattahámarkið bert 17%.

Eitt 17% skattahámark, við t.d. 30% sum marginalskatti av síðst forvunnu krónu, hevði givið búskapi okkara eina kúvend frameftir aftur.

Uppskotið førir við sær, sum nevndin vísir á, at tað verður neyðugt at justera býtið av skattainntøku millum land og kommunu. Eisini ger nevndin vart við vansarnar við lægri skattainntøku. Teir kenna vit. Sum búskaparstøðan er, virka fyrimunirnir við uppskotinum nógv sterkari nú enn tá.

Nevndin førir eisini fram, at løgfrøðiliga ber til at taka aliar lønir í Føroyum, eisini danskar, við í útrokniugina. Skuldi hetta tó ikki víst seg at verið so, ber altíð til at varðveita tær, og so skatta tær sum higartil eftir ótolulіga skattatrýstinum, sum nú beinir fyri allari framtíð hjá føroyingum.

Tilráðing frá uppskotsstillarunum. Tingmenn hava eftir øllum sólarmerkjum ikki kunnleika til týdningin av eini niðurlaðing av kostnaðarstøðinum. Til tess at kunna teir og almenningin um, at allir borgarar, hæði sum løntakarar og skattgjaldarar, verða betur fyri av einum lægri kostnaðarstøði, verður sett fram hetta

II Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið fer undir aðalorðaskifti um bjarging av føroyska búskapinum og varðveiting av Føroya fólki. Henda tingviðgerð tekur útgangsstøði í "Álitinum frá Arbeiðsbólkinum til at kanna avleiðingarnar av eini skatta- og lønarlækking", framlagt av sakkønu nevnd landsstýrisins 23. apríl 1990, og í niðurstøðuni í álitinum frá "Kjartan L. Kristiansen-bólkinum", framlagt í apríl 93 um lækking av kostnaðarstøðinum.

Áliti verða bæði framløgd sum skjøl við hesum tingmáli til aðalorðaskiftið.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 14. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Óla Breckmann vegna fólkaflokkin tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1994 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen, Karl Heri Joensen og Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við málinum og setir eingi uppskot fram.

Ein minniluti (Anfinn Kallsberg) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja bæði uppskotini til samtyktar I og II.

Ein annar minniluti (Tordur J. Niclasen) førir fram:

Lækking av skatti er ikki nóg stór kompensatión fyri nevndu lønarlækking og ger støðu borgaranna verri, enn hon er frammanundan.

Spurningurin krevur eina nógv gjøllari lýsing av fyrimunum og vansum, og eigur hetta at verða gjørt í samráð við m.a. verkaføløgini, skattamyndugleikarnar, peningastovnarnar og arbeiðsgevarafelagnar.

Minnilutin kann sostatt ikki taka undir við uppskoti I. Uppskoti II tekur minnilutin (Tordur J. Niclasen) undir við.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotini til samtyktar I og II fullu við 5-0 atkvøðum.

182 Um loysn av trupulleikunum hjá Arbeiðsloysisskipanini

Ár 1994, friggjadagin 18. mars legði Sverre Midjord, løgtingsmaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at álagt verður landsstýrinum at heita á donsku stjórnina um, at hon saman við Føroya Løgtingi tekur lut í fíggingini av Arbeiðsloysisskipanini soleiðis, at arbeiðsleysum føroyingum verða tryggjað mannsømilig kor á sama støði sum restini av ríkinum.

Viðmerkingar

Vegna feløgini:
Føroya Arbeiðarafelag
Føroya Prentarafelag
Føroya/Havnar Handverkarafelag
Havnar Arbeiðsmannafelag
Havnar Arbeiðskvinnufelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
Arbeiðskvinnufelagið Fjallbrúður
hevur Ingeborg Vinther, forkvinna, í skrivi boðað Føroya løgtingi frá, at omanfyri nevndu fakfeløg á fundi hava viðgjørt støðuna hjá teimum arbeiðsleysu og Arbeiðsloysisskipanini við atliti til tað, sum er farið fram í sambandi við, at skipanini vantar pening.

Í skrivinum verður sagt, at feløgini átala staðiliga, at landsstýrið í hesum máli hevur gingið uttan um tað stýrið, ið feløgini á arbeiðsmarknaðinum sambært lóg hava valt at umboða seg. Víðari verður sagt, at grundað á hetta og ásannandi, at lógarbroytingarnar, sum nú verða lagdar fyri tingið, vilja viðføra meirútreiðslur fyri skipanina t.d. veit eingin, hvussu nógv ein farloyvisskipan fer at kosta. Feløgini heita á løgtingið um at afturvísa lógaruppskotið og beina uppskotið í stýrið til viðgerðar av nýggjum.

At enda verður sagt í skrivinum (viðlagt).

Tað áliggur hvørjum einstøkum føroyskum politikara ein stór ábyrgd fyri at bera so í bandi, at fólkaflytingin úr Føroyum verður steðgað. Avgerðin er tykkara, skulu arbeiðsleysir føroyingar fáa loyvi at vera verandi í Føroyum og liva undir líka góðum korum, sum arbeiðsleys í hinum pørtunum av ríkinum.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið vurð beint í arbeiðaramálanevndina, sum 21. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Sverra Midjord, løgtingsmanni tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1994 beint í arbeiðaramálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Heini Johansen, Hildur Patursson og Helena Dam á Neystabø) tekur ikki undir við málinum, og vísir á uppskot landsstýrisins, tingmál nr. 133/1993: Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Minnilutin (Birgir Danielsen) tekur ikki undir við málinum og vísir á sínar viðmerkingar í álitinum í tingmáli nr. 133/1993: Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Minnilutin (Terje Davidsen) hevur hesar viðmerkingar: Uppskotið er lagt fram av Sverra Midjord, løgtingsmanni og tekur til viðgerðar tann veruleika at verðandi arbeiðsloysisskipan ikki megnar sína uppgávu at geva teimum arbeiðleysu mannsømmilig kor og at tey arbeiðsleysu verða meiri og minni slept upp á fjall.

Í uppskotinum til samtyktar verður álagt landsstýrinum at heita á donsku stjórnina um saman við Føroya løgting at taka lut í fíggingini av arbeiðsloysisskipanini solciðis, at arbeiðsleysum føroyingum verða tryggjað mannsømmilig kor.

Sambandsflokkurin hevur eisini viðgjørt henda sama spurning í løgtingsmáli nr. 186/1993 og liggja uppskotini heilt nær hvørjum øðrum. Bæði vísa á, at tað er landsstýrið, sum hevur ábyrgdina av at finna loysu á málinum um tey arbeiðsleysu. Bæði vísa á, at undir verandi umstøðum má hetta gerast við samráðingum við donsku stjórnina.

Minnilutin tekur í fyrsta lagi undir við uppskotinum hjá sambandsflokkinum í løgtingsmáli nr. 186/1993 og vísir á álitið í tí málinum.

Í øðrum lagi tekur minnilutin undir við fyriliggjandi uppskoti til samtyktar.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið fall við 7-0 atkvøðum.

183 Trygdarpeningur fyri avreiðing

Ár 1994, mánadagin 21. mars legði Jógvan I. Olsen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um trygdarpening fyri avreiðing.

§ 1.

Tá føroysk fiskifør, sum hava avreitt feskan fisk í 1991, og hava mist peningin, tí keyparin fór av knóranum, og ikki fingið peningin úr Trygdargrunninum fyri avreiðingar og lønir, verða 50% av avreiðingarvirðinum útgoldin. Peningurin verður at taka av konto § 16 - 16469: Varðveiting av fjølbroyttum flota, á fíggjarlóg løgtingsins.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om garantipenge for indhandling.

§ 1.

Færøsk fiskefartøj, der har indhandlet fersk fisk i 1991, og som har tabt pengene på grund af købers fallit, og som ikke har fået pengene udbetalt af garantifonden for fiskeindhandlinger og løn, får udbetalt 50% af indhandlingens værdi. Pengene disponeres af konto § 16 - 16469: Bibeholdelse af differ. Flåde, på lagtingets finanslov.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar

8. mai 1991 varð lógin um Trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir broytt. Henda broyting førdi við sær, at fiskifør vórðu verri fyri, um tey áttu pening tilgóðar, tá fiskakeyparar fóru av knóranum, og mong vóru tey fiskifør, sum mistu pening.

Fyri at bøta eitt sindur upp á støðuna hjá hesum førum, samtykti løgtingið eitt broytingaruppskot til løgtingslógina fyri 1994, so fiskifør, sum høvdu mist pening og ikki fingið úr Trygdargrunninum, skuldu fáa 50% av tí, tey høvdu mist í 1992 og 1993.

Nú er komið fram, at okkurt fiskifar eisini hevur mist pening í 1991, og tað verður hildið rímiligt, at øll fiskifør, sum hava mist pening síðani lógin varð broytt í 1991, eisini eiga at koma undir somu skipan.

Samsvarandi hesum verður sett fram uppskot um løgtingslóg, ið væntast at kosta 500.000 kr.

1. viðgerð 24. mars 1994. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 17. mai 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Jógvan I. Olsen, løgtingsmanni, tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 24. mars 1994 heint í tíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Heini O. Heinesen og Karl Heri Joensen) tekur ikki undir við fyriliggjandi lógaruppskoti.

Ein minniluti (Anfinn Kallsberg, Flemming Mikkelsen og Tordur J. Niclasen) setir eingi uppskot fram, men tekur støðu í tingsalinum.

Málið varð ikki liðugt viðgjørt vegna samgongurofs.

184 Broytingar í kommunulógini

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Bergur Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um føroysku kommunurnar.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 45 frá 29. juni 1972 um føroysku kommunurnar verða gjørdar hesar broytingar:

1. Aftaná § 1 verður sum nýggj § 1 a sett:
   "**§ 1 a.** Kommunurnar røkja sínar uppgávur sambært rættinum at skipa egin viðurskifti.
   Stk. 2. Kommunur kunnu ikki reka vanligt vinnuvirksemi, heruppií fiski-

lagtingslov om ændring i lagtingslov om de færøske kommuner.

§ 1.

I lagtingslov nr. 45 af 29. juni 1972 om de færøske kommuner foretages følgende ændringer:

1. Efter § 1 indsættes som ny § 1 a:
   "**§ 1a.** Kommunerne varetager deres opgaver i henhold til retten til selvstændigt at styre egne anliggender.
   Stk. 2. Kommunerne kan ikki drive almindelig erhvervsvirksomhed, herunder fiskeridrift, eller deltage i

vinnu, ella luttaka í tílíkum virksemi, beinleiðis ella óbeinleiðis, t.d. við studningi, partapeningi, lánveitan ella veðhaldsveitan, uttan við heimild í lóg ella sambært lóg.

Stk. 3. Kommunur kunnu tó reka ella luttaka í virksemi, sum vanliga kemur undir virkisøki hjá kommununum, m.a. grótbrot, asfaltverk, bussrakstur, renovatión, el-veiting, vatnveiting og virksemi, sum hevur serstakt tilknýti til annað kommunalt virksemi."

2. § 11 verður orðað soleiðis:

"**§ 11.** Fyri luttøku á kommunustýrisfundum og fundum í nevndum, sum kommunustýrið velur sambært reglugerð við heimild í hesi lóg, verður veitt fundarsamsýning.

Stk. 2. Samsýning kann eisini verða veitt fyri annað nevndararbeiði.

Stk. 3. Formanninum í einari av kommunustýrinum settari nevnd kann verða veitt ein serlig árlig samsýning.

Stk. 4. Landsstýrið setir við kunngerð nærri reglur um samsýningar eftir stk. 1, 2 og 3. Tær samsýningar, sum eru í gildi tá henda lóg kemur í gildi verða verandi í gildi til annað er ásett av landsstýrinum."

3. § 27 verður orðað soleiðis:

"**§ 27.** Reglur um samsýning til bygda(r)ráðsformannin og næstformannin verða ásettar av landsstýrinum við kunngerð. Tær samsýningar, sum eru í gildi, tá henda lóg fær gildi verða verandi í gildi til annað er ásett av landsstýrinum".

4. § 33 verður orðað soleiðis:

"**§ 33.** Kommunan skal hava eina sakkøna grannskoðan, sum verður at góðkenna av landsstýrinum. Hendan grannskoðanin kann ikki verða koyrd frá uttan loyvi landsstýrisins.

Stk. 2. Grannskoðanin skal umfata øll roknskaparøki, sum hoyra undir

sådan virksomhed direkte eller indirekte, f.eks. med tilskud, aktiekapital, lån eller garanti uden med hjemmel i lov eller i henhold til lov.

Stk. 3. Kommunerne kan dog drive eller deltage i virksomhed, der i almindelighed kommer under kommunernes virksomhedsområde, bl.a. stenbrud, asfaltværk, busdrift, renovation, el-forsyning, vandforsyning og virksomhed, der har særlig tilknytning til anden kommunal virksomhed."

2. § 11 affattes således:

"**§ 11.** For deltagelse i møder i kommunalbestyrelsen og møder i udvalg, som kommunalbestyrelsen vælger i henhold til styrelsesvedtægten med hjemmel i denne lov, ydes mødevederlag.

Stk. 2. Vederlag kan også ydes for andet udvalgsarbejde.

Stk. 3. Til formanden for en kommunalbestyrelse kan der ydes et særligt årligt vederlag.

Stk. 4. Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse nærmere bestemmelser om vederlag efter stk. 1, 2 og 3. De vederlag, der er i kraft ved denne lovs ikrafttræden, fortsætter at være i kraft til landsstyret fastsætter andet."

3. § 27 affattes således:

"**§ 27.** Regler om vederlag til bygderådsformanden og næstformanden fastsættes af landsstyret i bekendtgørelse. De vederlag, der er i kraft ved denne lovs ikrafttræden, fortsætter at være i kraft til landsstyret fastsætter andet."

4. § 33 affattes således:

"**§ 33.** Kommunen skal have sagkyndig revision, der skal godkendes af landsstyret. Denne revision kan ikke afskediges uden landsstyrets samtykke.

Stk. 2. Revisionen skal omfatte alle under bygderådet henhørende regn-

bygda(r)ráðið. Grannskoðanin skal eftirkanna um roknskapurin er rættur, og um tær atgerðir, ið eru umfataðar av roknskapinum, eru í samsvari við gevnar játtanir, avgerðir bygda(r)ráðsins annars, lógir og aðrar fyriskipanir, umframt við avtalur og umsitingarliga venju.

Stk. 3. Tað áliggur grannskoðanini at fremja eina vandna gjøgnumgongd av roknskaparførðsluni hjá kommununi, og av teimum í tí sambandinum skipaðu eftirlitstiltøkum, fyri at eftirkanna um hesi tøl eru tryggjandi.

Stk. 4. Grannskoðanin kann frá bygda(r)ráðnum krevja allar fyri grannskoðanina neyðugar upplýsingar."

5. § 39 verður orðað soleiðis:

"**§ 39.** Bygda(r)ráðið kann upptaka lán til ávísar íløgur, størri umvælingararbeiði o.l. og lántøkan skal vera rímilig í mun til fíggjarorkuna hjá kommununi. Lán kunnu eisini upptakast í sambandi við umlegging av lánum, og til fyribils rakstur, um rakstrarlánið verður afturgoldið yvir raksturin sama fíggjarár.

Stk. 2. Landsstýrið setur við kunngerð nærri reglur um tey í stk. 1. nevndu viðurskifti, og aðrar reglur um lántøkuna hjá kommununum, m.a. um hvussu stórur partur av íløgukostnaðinum skal vera eginfígging, treytir fyri lánum, góðkenning landsstýrisins v.m.

Stk. 3. Landsstýrið setur við kunngerð reglur um í hvønn mun bygda(r)ráðið kann binda kommununa við veðhaldsskyldum ella við tilsøgn um regluligar veitingar, sum kommunan ikki eftir lógini hevur skyldu til, og um góðkenning landsstýrisins av tílíkum avgerðum."

6. § 41 verður orðað soleiðis:

"**§ 41.** Landsstýrið setur við kunngerð nærri reglur um, í hvønn mun bygdar(r)ráðið kann selja ella veðseta

skabsområder. Ved revisionen efterprøves om regnskabet er rigtigt, og om de dispositioner, der er omfattet af regnskabsaflæggelsen er i overensstemmelse med meddelte bevillinger, kommunalbestyrelseens øvrige beslutninger, love og andre forskrifter, samt med indgåede aftaler og sædvanlig praksis.

Stk. 3. Det påhviler revisionen at foretage en kritisk gennemgang af kommunens regnskabsføring og de i den forbindelse etablerede kontrolforanstaltninger med henblik på at efterprøve, om disse er betryggende.

Stk. 4. Revisionen kan forlange oplysninger fra bygderådet, som er nødvendige for revisionens virksomhed."

5. § 39 affattes således:

"**§ 39.** Bygderådet kan optage lån til visse investeringer, større reparationer o.l. og lånoptagelsen skal være rimelig i forhold til kommunens financielle styrke. Lån kan også optages i forbindelse med omlægning af lån, og til foreløbig drift, såfremt driftslånet tilbagebetales over driften samme finansår.

Stk. 2. Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse nærmere bestemmelser om de i stk. 1 nævnte forhold, og andre bestemmelser om kommunernes lånoptagelse, bl.a. om hvor stor en andel af investeringsomkostningerne skal være egenfinanciering, betingelser for lån, landsstyrets godkendelse m.v.

Stk. 3. Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse bestemmelser om, i hvilket omfang bygderådet kan binde kommunen med garantiforpligtelser eller med regelmæssige ydelser, som kommunen ikke efter lovgivningen er forpligtet til og om landsstyrets godkendelse af sådanne afgørelser."

6. § 41 affattes således:

"**§ 41.** Landsstyret fastsætter i be-

ognirnar hjá kommununi, ella fáa sær nýggjar fastar ognir, og um góðkenning landsstýrisins."

7. Aftaná § 41 verður sum nýggj § 41 a sett:

"**§ 41 a.** Avtalur um samstarv millum kommunur, sum hava við sær avmarkingar í heimildunum eftir hesi lóg hjá teimum luttakandi kommununum, skulu góðkennast av landsstýrinum, uttan so, at annað er serliga heimilað í lóggávuni.

Stk. 2. Avtalur, sum nevndar eru í stk. 1 kunnu sigast upp, um partarnir eru samdir um tað. Eisini kunnu tílíkar avtalur sigast upp eftir áheitan frá einum av partunum, um landsstýrið góðkennir tað.

Stk. 3. Treytirnar fyri uppsøgnini skulu góðkennast av landsstýrinum, og verða ásettar av landsstýrinum um partarnir eru ósamdir.

8. § 42, stk. 1, verður orðað soleiðis:

"Landsstýrið kann seta úr gildi samtyktir hjá einum bygda(r)ráð, sum eru í stríð við lóggávuna. Undir viðgerðini av málinum kann landsstýrið fyribils seta avgerðina úr gildi. Er avgerðin sett í verk, kann avgerðin tó bert fyribils ella endaliga setast úr gildi um

1) ein partur skrivliga heitir á landsstýrið um tað
2) eingin kærumøguleiki er eftir aðrari lóggávu og
3) munandi fyrilit, serliga til privat áhugamál, ikki tala ímóti tí."

9. Sum nýtt stk. 3 í § 48, verður sett:

"**Stk. 3.** Landsstýrið ella bygda(r)ráðið kann gera av, at fólkaatkvøða um samanlegging av kommunum skal verða í einari ella fleiri kommunum. Fólkaatkvøðan fer fram eftir reglunum í kommunuvallógini. Er meiriluti í hvørjari kommunu, av teimum, sum hava atkvøtt, fyri samanlegging, kann landsstýrið gera av, at kommunurnar verða lagdar saman og landskendtgørelse nærmere bestemmelser om, i hvilket omfang bygderådet kan sælge eller pantsætte kommunens ejendomme og om landsstyrets godkendelse."

7. Efter § 41 indsættes som ny § 41 a:

"**§ 41 a.** Aftaler om samarbejde mellem kommuner, der medfører indskrænkninger i bemyndigelserne efter denne lov for de deltagende kommuner, skal godkendes af landsstyret, medmindre andet er specielt hjemlet i lovgivningen.

Stk. 2. De i stk. 1 nævnte aftaler kan opsiges, om parterne er enige. Også kan sådanne aftaler opsiges efter anmodning fra en af parterne, såfremt landsstyret godkender dette.

Stk. 3. Betingelserne for opsigelsen skal godkendes af landsstyret og fastsættes af landsstyret såfremt parterne ikke er enige."

8. § 42, stk. 1 affattes således:

"Har kommunalbestyrelsen truffet en beslutning, der strider mod lovgivningen kan landsstyret sætte beslutningen ud af kraft. Under behandlingen af sagen kan landsstyret midlertidigt suspendere den pågældende beslutning. Er beslutningen bragt til udførelse, kan den dog kun suspenderes eller sættes ud af kraft hvis

1) en part over for landsstyret skriftligt fremsætter begæring herom,
2) der ikke efter anden lovgivning er en klageinstans og
3) væsentlige hensyn, særlig til private interesser, ikke taler herimod."

9. Som nyt stk. 3 i § 48 indsættes:

"**Stk. 3.** Landsstyret eller bygderådet kan bestemme, at folkeafstemning om sammenlægning af kommuner skal finde sted i en kommune eller flere kommuner. Folkeafstemning finder sted efter bestemmelserne i kommunevalgloven. Er der i hver

stýrið skipar fyri hesi samanlegging."

10. Sum nýtt stk. 4 í § 48 verður sett:
"**Stk. 4.** Í treytunum fyri samanleggingini kunnu verða gjørd tílík frávik frá galdandi lógum og fyriskipanum v.m., sum kunnu grundast við teimum serligu viðurskiftunum, ið standast av samanleggingini."

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1995.

enkelt kommune flertal af dem, der har afgivet stemme, for forslaget, kan landsstyret bestemme at kommunerne lægges sammen og landsstyret forestår sammenlægningen."

10. Som nyt stk. 4 i § 48 indsættes:
"**Stk. 4.** I vilkårene for sammenlægningen kan der foretages sådanne afvigelser fra gældende love og bestemmelser m.v., der kan begrundes med de særlige forhold, der er en følge af sammenlægningen.

§ 2.

Denne lov træder i kraft den 1. januar 1995.

Viðmerkingar

Í Ólavsøkurøðu løgmans í fjør var boðað frá, at landsstýrið í hesi tingsetuni fór at koma við uppskoti um broytingar í kommunalógini. Broytingarnar í samfelagnum hava sum kunnugt gingið skjótt síðani tá, og longu í heyst var neyðugt hjá landsstýrinum at koma við uppskoti um ávísar broytingar í lógini við uppskotinum um kommunalu fíggjarætlanirnar, kommuneskattaprosenti, kreppugrunn v.m. Hendan lógin nøktar í ávísan mun tørvin, ella ið hvussu so er í ein ávísan mun tann akutta tørvin á lógargrundarlagi til at fáa kommunala sektorin aftur á beint.

Høvudsbroytingarnar í hesum uppskotinum í mun til galdandi kommunulóg eru:
At kommunurnar ikki kunnu luttaka beinleiðis í vinnulívinum.
At kommunurnar bert kunnu upptaka lán til ávísar fløgur, og størri umvælingararbeiði, sum kunnu verða nærri tilskilað í kunngerð, og í kunngerðini kunnu krøv setast til eginfígging og lánstreytirnar.
At landsstýrið eisini kan skipa fyri fólkaatkvøðu í kommununum um samanlegging av kommunum, og skipa fyri samanleggingini, um meiriluti er fyri tí.

Eisini verður skotið upp, at landsstýrið fær heimild at gera generellar reglur (kunngerðir) um samsýningar til bygda(r)ráðslimir og bygda(r)ráðsformenn um lántøku, veðhaldsveitan, keyp, og sølu hjá kommununum.

Herumframt er skotið upp at gera nakrar broytingar í verandi lógarteksti, sum præsisera galdandi rætt § 1, nr. 4, § 1, nr. 8 og § 1, nr. 9.

Spurningurin um kommunala luttøku í vinnulívinum hevur av og á verið frammi, seinast í vár, tá kommunur ynskti at seta pening í feløg, sum skuldu keypa fiskiskip. Landsstýrið samtykti tá at boðað kommununum frá, at tað eftir landsstýrisins áskoðan ikki er ein kommunal uppgáva at luttaka beinleiðis í vinnulívinum.

Landsstýrisins sjónarmið er, at kommunal luttøka í vinnulívinum virkar kappingaravlagandi, tí tá kommunurnar eru uppií, verða avgerðirnar ikki tiknar á handilsligum og rakstrarliga forsvarligum grundarlagi. Kommunurnar nýtast t.d. ikki at hugsa um, at vinnutól gevur nakað av sær, tað er nóg mikið, at tað gevur nakað av virksemi í kommununi. Prísásetingin verður tí avlagað, og privatir fáa ólíka kapping.

Landsstýrið hevði onga staðiliga heimild at forða kommununum at seta pening í feløgini, um tær ikki gjørdu eftir boðunum frá landsstýrinum. Føroya kommunufelag hevur eisini víst á trupulleikan, og hevur í skrivi til landsstýrið mælt til, at um landsstýrið fastheldur støðu sína, so at útvega sær staðiliga heimild at nokta kommununum at seta í vinnulívið.

Eftir uppskotinum fær landsstýrið heimild at gera alm. reglur, kunngerðir um ymisk viðurskifti viðvíkjandi fyrisitingini av kommunum, m.a. um kommunalu lántøkurnar, veðhaldsveitan, keyp og sølu av fastari ogn og samsýningar til bygda(r)ráðslimir og bygdaráðsformenn. Umsitingin av hesum málum verður tí meira reglubundin, men fer eisini at styrkja hana og gera umsitingina meira einsháttaða, og kommunurnar kunnu betur leggja sínar ætlanir.

Hetta landsstýrið hevur ikki ynskt, at tað verður lóggivið um at leggja kommunurnar saman, men hevur havt ta áskoðan, at samanlegging av kommunum eigur at vera sjálvboðin. Men landsstýrið ásannar, at tað kann verða ein skilagóð loysn í ávísum førum, at kommunur verða lagdar saman. Tann 21. desember í fjør góðkendi landsstýrið samanleggingarsáttmála milium Argja kommunu og Tórshavnar kommunu, og metti landsstýrið, at hetta var ein góð loysn fyri báðar kommunurnar. Sum er, kann ein tepur meiriluti í einum bygda(r)ráð forða fyri eini annars skilagóðari samanlegging, sum íbúgvarnir í kommununi møguliga eru fyri.

Skotið verður tí upp, at landsstýrið kann leggja spurningin til fólkaatkvøðu í kommununi, og um meiriluti er fyri tí, skipa fyri samanlegging.

Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar.

Til § 1, nr. 1.
Tað er ikki møguligt úttømandi at áseta, hvørjar uppgávur kommunurnar kunnu taka sær av, men má tað avgerast frá máli til mál, eftir grundsjónarmiðnum um, at tað skulu vera uppgávur av felags áhuga. Kommunur kunnu tí heldur ikki veita fíggjarligan stuðul til einstakar persónar, uttan við heimild í lóg. Sum heild kann tí umframt hetta, bert sigast, at kommunurnar eru umfataðar av vanligum fyrisitingarligum grundsetningum so sum, at óviðkomandi fyrilit skulu ikki ávirka avgerðirnar, og at eins føri skulu viðgerðast eins.

Í § 1, stk. 2 verður staðiliga fyriskipað, at kommunurnar hereftir ikki kunnu luttaka beinleiðis í vinnulívinum, og er hetta ein broyting í mun til galdandi rætt. Hetta forðar ikki fyri, at kommunurnar eins og higartil kunnu - og eiga - at vera við til - tá fíggjarligar umstøður verða til tað aftur - við íløgum í infrastrukturin, vegir, havnir o.s.fr., at skapa best møguligu umstøður fyri vinnulívinum í kommununi.

Vanligt vinnuvirksemi umfatar virksemi innanfyri fiskivinnu landbúnað, handil, ídnað, heruppií fiskivinnuídnað, tænastuvinnu, sum vanliga hevur verið rikin av privatum, eftir handilsligum sjónarmiðum. Tó ber til hjá kommunu, í sambandi við t.d. eina ítróttarhøll- eila

vøll, at reka restauratiónsvirksemi smbrt. stk. 3.

Til § 1, nr. 2 og nr. 3.
Her verður gjørd tann broyting, at landsstýrið fær heimild til, í staðin fyri at áseta samsýningar til bygda(r)ráðslimir og bygda(r)ráðsformenn eftir umsókn í hvørjum einstøkum føri, at áseta samsýningarnar við kunngerð. Hetta hevur við sær umsitingarligar lættar.

Til § 1, nr. 4.
Reglurnar um grannskoðanina eru viðkaðar, við staðiligum reglum um uppgávurnar hjá grannskoðanini. Grannskoðanin skal verða sakkøn, og eigur kravið at vera, at grannskoðanin verður gjørd av roknskaparkønum persóni, sum er skrásettur ella løggildur grannskoðari. Grannskoðanin skal tryggja bygda(r)ráðnum og borgarunum, at fíggjarligu viðurskiftini í kommununi verða umsitin á rættan hátt. Í tí sambandinum skal grannskoðanin serliga eftirhyggja, at fíggjarliga umsitingin er í samsvari við lóggávuna, við fíggjarætlanina hjá kommununi, og tær játtanir sum bygda(r)ráðið hevur givið, og skal gera neyðugar viðmerkingar um hesi viðurskiftini.

Til § 1, nr. 5.
Eftir hesi grein kunnu kommunurnar ikki lána til vanligan rakstur, undantikin rakstrarlán, sum verða afturgoldin yvir raksturin sama fíggjarár. Ilt er at áseta í stuttum í sjálva lógina hvat lænast kann til, tí virkisøkið hjá kommununum er víttfevnandi, og raðfestingarnar av uppgávunum broytast yvir lutalsliga stutta tíð. Tí verður skotið upp, at tær nærri reglurnar um hvørji endamál lánast kann til, verða settar í kunngerð, og at í kunngerðina eisini verða settar aðrar treytir m.a. um eginfígging, t.d. soleiðis, at ein ávísur prosentpartur av íløguni skal verða skattafíggjarður við støtri kravi til eginfíggingina tess minni íløgan er í % av skattagrundarlagnum.

Til § 1, nr. 7.
Kravið um góðkenning umfatar avtalur, har ein serligur samstarvsmyndugleiki fær heimild at binda kommunurnar fíggjarliga viðvíkjandi lánupptøku, veðhaldi, keypi, sølu og veðseting av fastari ogn o.s.fr. Eisini avtalur, sum áleggja kommununum viðvarandi skyldur, og sum ikki kunnu uppsigast innanfyri stytiri áramál, skulu góðkennast.

Til § 1, nr. 8.
Reglan staðfestir regluna í óskrivaðum rætti um, at vanliga eftirlitið við kommununum ikki er ein kærumyndugleiki (rekursmyndugleiki), og tí ikki vanliga kann seta avgerðir hjá bygda(r)ráðnum, sum eru settar í verk, úr gildi, hóast tær eru í stríð við lóggávuna, men bert kann seta hesar úr gildi, um avgerðin ikki er sett í verk, ella, um avgerðin er sett í verk, tá bert um ávísar nærri tilskilaðar treytir eru til staðar.

Til § 1, nr. 9.
Eftir galdandi lóg kunnu kommunurnar bert verða lagdar saman, um tær sjálvar ynskja tað, t.e. um bygda(r)ráðini í kommununum samtykkja tað.

Skotið verður upp, at kommunur eisini kunnu leggjast saman, um ein fólkaatkvøða í kommununum vísir, at ein meirluti av teimum, sum hava atkvøtt, eru fyri tí. Um landsstýrið metir at skilagott er at leggja tvær ella fleiri ávísar kommunur saman, kann landsstýrið leggja uppskot um samanlegging av kommunum til fólkaatkvøðu í teimum kommununum, sum

samanleggingin skal fata um. Er meiriluti av teimum, sum hava atkvøt, fyri samanleggingini í hvørjari kommunu, har fólkaatkvøða hevur verið, kann samanleggingin fara fram, annars ikki.

Til § 1, nr. 11.
Í treytunum fyri teimum báðum samanleggingum, sum hava verið síðan galdandi kommunulóg kom í gildi, eru gjørd minni frávik frá galdandi lógum. Hetta hevur ikki havt stórvegis trupulleikar við sær, men verður nú staðilig heimild fyri hesum.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í rættarnevndina. Burturdottið vegna samgongusilt.

185 Nýggir vinnumøguleikar

Ár 1994, friggjadagin 18. mars legði Niels Pauli Danielsen, løgtingsmaður, vegna, kristiliga fólkaflokkin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við donsku stjórnina um lagaliga fígging til fløgur í vinnuna á sjógvi og landi, sum kunnu skapa nýggjar møguleikar og geva vinnulívinum tann neyðuga íblástur.

Viðmerkingar

Danska ráðleggingarnevndin er ikki bjørt í spádómum sínum. Eingi útlit heldur hon vera fyri, at gongdin í Føroyum steðgar og fer tann rætta vegin í bræði.

Tað er at vóna, at danska stjórnin lurtar eftir hesi ráðleggingarnevnd síni og sær, at neyðugt er við nýggjari peningainnsprøtning í føroyska samfelagið, um lív skal vera okkum lagað á hesum oyggjum.

Tá skuldu verið góðir møguleikar fyri, at landsstýrið kann taka upp nýggjar samráðingar við danir og útvega føroyska samfelagnum lagaliga fígging til nýggjar íløgur í vinnu okkara á sjógvi og landi.

Møguleikarnir eru stórir, bæði innan fiskivinnu við teimum røttu skipunum og virkjunum og innan aðrar vinnuna, um loftið og kvoturnar fyri føroyskar fiskavørur verða hækkaðar á ES-marknaðinum. Eisini oljuvinnan kann koma at útvega føroyska samfelagnum nógv góð arbeiðspláss, verður farið fram við skynsemi.

Útlendsk fígging hevur fyrr fingið gongd á í Føroyum. Marshall-hjálpin eftir seinasta heimsbardaga og 60-miljónagrunnurin fyrst í 60'unum var ein góð peningainnsprøtning í føroyska samfelagið, sum kom væl við.

Tað er tí neyðugt hjá okkum, at vit manna okkum aftur av nýggjum fram móti bjartari tíðum.

1. viðgerð 25. mars 1994. Málið vard beint í idnaðarnevndina, sum 22. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er tagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð beint í idnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Jacob Lindenskov, Karl Heri Joensen og Olaf Olsen) setir eingi uppskot fram.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen) vísir á felagsálit í tingmálinum nr. 128/1993: Veðhald fyri láni til Arbeiðsloysistryggingina og Arbeiðsávísingina og nr. 129/1993: Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, har minnilutin hevði soljóðandi uppskot til samtyktar: "Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við ríkisstjórnina um eina upp á longri sikt haldbæra loysn, har allir okkara landsumfatandi trupulleikar verða tiknir við."

2. viðgerð 26. apríl 1994. Uppskotið fall við 2-0 atkvøðum.

186 Broytingar í arbeiðsloysisskipanini

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Terje Davidsen, løgtingsmaður, vegna sambandsflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at leggja fyri tingið uppskot um broytingar í arbeiðsloysisskipanini, sum miða ímóti, at landskassin fær størri ábyrgd av arbeiðsloysisskipanini við at átaka sær t.d. 60% av inngjaldinum.

Viðmerkingar

Núverandi skipan hevur í verki vist, at hon ikki er haldbær. Tí er bráðneyðugt at gera eina skipan, sum virkar á einum tryggari støði.

Sambandsfloksins hugsan er, at hetta er ein almenn uppgáva at loysa saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

Áskoðan okkara er, at inngjaldið til ALS kundi verið til dømis 60% úr landskassanum og 40% frá arbeiðsmarknaðinum.

Arbeiðsloysisskipanin er vorðin partur í avtalunum millum Føroya landsstýri og donsku stjórnina.

Skipanin í Danmark er, at tað almenna letur 60% og partarnir á arbeiðsmarknaðinum lata 40%. Tí kann roknast við, at danska stjórnin uttan iva fer at góðtaka, at líknandi skipan verður sett í gildi fyri Føroyar.

1. viðgerð 24. mars 1994. Málið varð beint í arbeiðaramálanevndina, sum 21. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av sambandsflokkinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 24. mars 1994 beint í arbeiðaramálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Heini Johansen, Hildur Patursson og Helena Dam á Neystabø) tekur ikki undir við málinum, og vísir á uppskot landsstýrisins, tingmál nr. 133/1993: Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Minnilutin (Birgir Danielsen) tekur ikki undir við málinum og vísir á sínar viðmerkingar í álitinum í tingmáli nr. 133/1993: Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Minnilutin (Terje Davidsen) hevur hesar viðmerkingar: Málið er lagt fram av sambandsflokkinum og snýr seg um at fáa arbeiðsloysistryggingina í eina tryggari legu.

Ferð eftir ferð hevur verandi skipan við arbeiðsloysistrygging víst, at hon megnar ikki uppgávuna, henni er fyriseit.

Árið 1993 var samlaða lønarútgjaldingin í øllum landinum 3,3 mia. kr.

Í regluligum inngjaldi til arbeiðsloysisskipanina kom 170 mió. kr.

Inngjaldið er áleið 5% av útgoldnu lønunum.

Útgjaldið hjá arbeiðsloysisskipanini var hartil móti 284 mió. kr.

Hetta vísir, at regluliga inngjaldið klárar ikki at fíggja verandi útgjaldsskipan. Skuldi inngjaldið klára tað, var neyðugt við einum inngjaldsprosentið uppá áleið 8.6% (4,3% til hvønn partin á arbeiðsmarknaðinum).

Tá so er, er neyðugt annaðhvørt at minka útgjaldið ella at hækka inngjaldið. Ella ein kombinatión av báðum. Í 1993 hava samhaldsfasti og frítíðargrunnurin latið nakað av peningi til skipanina so útgjald hevur kunna farið fram. Hetta hava bert verið lappaloysnir. Útgjaldið frá ALS er so mikið lítið, at skal stuðulin gera nakran mun, er ikki tilráðiligt at lækka útgjaldið. Hetta eigur at vera ein uppgáva hjá landsstýrinum at gera yvir fíggjarlógina. Tí verður skotið upp, at landsstýrið í størri mun átekur sær ábyrgdina av skipanini, so henda kann koma í eina trygga legu.

Nú er arbeiðsloysisskipanin tikin við í avtalurnar við donsku stjórnina, tí er neyðugt, um tað í skipanini verða gjørdar broytingar, sum hava við sær størri útreiðslur fyri landskassan, at hesar verða gjørdar í samráð við donsku stjórnina.

Ein spurningur er hvat danska stjórnin vil góðtaka av loysnum fyri skipanina í Føroyum. Har eigur at verða hugt eftir hvørja skipan arbeiðsleys í Danmark hava.

Í Danmark er skipanin fíggjað við at tað almenna letur eini 70% meðan partarnir á arbeiðsmarknaðinum lata 30%. Ikki er óhugsandi at danska stjórnin vil góðtaka, at líknandi skipan verður sett í gildið fyri Føroyar.

Verandi danska skipan kundi í hesum máli verið útgangsstøði hjá landsstýrinum undir samráðingunum við donsku stjórnina.

Ásannandi, at arbeiðsloysisskipanin sum er, ikki megnar sína uppgávu vegna manglandi inntøkugrundarlag, og ásannandi at tað er landsstýrið, sum hevur ábyrgdina av at finna eina virðiliga loysn á trupulleikunum hjá teimum arbeiðsleysu, mælir minnilutin til at samtykkja fyriliggjandi uppskot sambandsflokksins.

2. viðgerð 26. apríl 1994. Málið fall við 7-0 atkvøðum.

187 Familjumál

Ár 1994, mánadagin 21. mars legði Niels Pauli Danielsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Førova framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Føroya løgting samtykkir at seta eina nevnd við 1 limi úr hvørjum flokki á tingi, sum í familjuárinum (1994), ST hevur lýst, kannar umstøðurnar hjá familjuni og børnunum í Føroyum í dag og leggur uppskot fyri ólavsøkutingsetuna um, hvussu lóggávan á bestan hátt stuðlar familjuni, verjir heimið og gevur børnunum tryggan uppvøkstur.

Viðmerkingar

ST-samtyktin um mannarættindi § 16, stk. 3 sigur:

"Familjan er hin náttúrligi og grundleggjandi eindarbólkurin í samfelagnum og hevur tí krav upp á verju samfelagsins og ríkisins."

1994 hevur ST lýst sum familjuár. Iletta eigur eisini at fáa okkum í Føroyum at steðga á og seta okkum sjálvum spurningin, hvussu tð statt er í familjum okkara.

Fyrr hevur verið víst á, at tað gongur út yvir familjuna og uppalingina, at arbeiðið við hús verður ikki mett, sum tað eigur at vera, og stuðlað t.d. gjøgnum lóggávuarbeiðið.

Í grannalondum okkara verður tað ólønta arbeiðið, ið gjørt verður m.a. heima við hús, talt upp í bruttotjóðarúrtøkuna við heilum 37,5%.

Nevnir tú familjuna, verður púra rætt fyrst hugsað um børnini.

Árini 1985-88 hevði Kristiligi fólkaflokkurin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokkur, málsøkið familjumál í hondum, og samtyktar vórðu fleiri lógir her í løgtinginum, sum stuðlaðu teimum, sum hava børn, t.d. lógin um barnastyrk, sum seinni er avtikin undir

fólkaflokkinum og javnaðarflokkinum, og lóg um barsilsorlov, sum gav rætt til dagpening eisini í sambandi við ættleiðing. Eisini hesa lóg hava teir somu flokkar tingið avtikið.

Eitt annað týdningarmikið familjupolitiskt mál er stríðið ímóti rúsdrekkamisnýtslu, sum oyðileggur so mangt eitt heim. Eisini á hesum øki varð ferð sett á, meðan Kristiligi fólkaflokkurin hevði málsøkið undir sær í landsstýrinum.

Vísast kann til uppskotini, sum undirritaði setti fram á fundi seinasta summar í Tórshavn hjá Tingmannaráði Útnorðurs um at kanna korini hjá børnunum og barnafamiljum í londunum í útnorði og herða stríðið ímóti rúsdrekkamisnýtslu og samskipa tað í londum okkara.

Hesi uppskot verða løgd fyri tingini í útnorði at taka støðu til og kunna hóskandi verða tikin upp í arbeiðið hjá føroysku nevndini.

Støðan hjá teimum mongu heimunum í hesum vánaligu tíðunum, har nógv standa til at missa hús síni, er eisiuí neyðug at taka fram.

1. viðgerð 24. mars 1994. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina. Burturdottið vegna samgonguslit.

188 Viðvíkjandi nýtslu av senditíð hjá Útvarp Føroya

Ár 1994, mánadagin 21. mars legði Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið sum skjótast at taka neyðug stig til at kanna um áhugi er í Føroyum og/ella uttaulanda at gera nýtslu av ónýttu senditíð hjá Útvarpinum.

Viðmerkingar

Millumbylgjusendari Útvarpsins verður sum kunnugt bert nýttur ein part av døgnintum.

Tað, at sendarin er tøkur nógvar tímar á døgninum, átti at gjørt tað møguligt, at ónýtta senditíðin stóð øðrum í boðið at nýta. Tá hugsað verður um ta stóru skipaferðslu sum dag og

dagliga fer framvið og annars hvussu langt sendarin við fullari styrki røkkur, skal tað vera løgið um ikki onkur er áhugaður fyri at keypa/leiga senditíð.

Umframt at givið inntøkur til Útvarp Føroya (landskassan), so kundi útleigan av senditíð eisini skapt fortreytir fyri, at lýsingar um Føroyar og føroysk viðurskifti regluliga vórðu send á avvarðandi tungumáli.

Hetta kundi uttan iva havt týdning fyri m.a. menningina av ferðavinnuni. Kanska kundi verið kannað fyrst um áhugin fyri hesum var í grannalondum okkara.

Hvat tí fíggjarliga viðvíkur, hevði hetta givið útvarpinum øktar møguleikar fyri at gjørt nýtslu av MB-sendaranum, til gagns fyri okkara siglandi fólk eins væl og ein part av teim mongu, sum hava búsett seg uttan fyri Føroyar.

Í hesum døgum verður leitað sum við lykt eftir møguleikum, ið kunnu geva nakrar krónur í landskassan - ella til tað føroyska húsarhaldið.

Her er so ein møguleiki, sum eigur at verða royndur, og verður mett náttúrligt, at landsstýrið ger hetta í nøvum samstarvi við útvarpið.

1. viðgerð 24. mars 1994. Málið varð beint í mentanmar- og skúlanevndina, sum 26. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni tann 21. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 24. mars 1994 beint í mentanmar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, sum, hóast tað er árligur gestur á tingborði, er sera lítið lýst av uppskotsstillaranum.

Eisini hevur nevndin havt fund við útvarpsstjóran um hetta mál.

Millumbylgjusendarin røkkur mest havøkið kring Føroyar og bert smávegis inn í næstu grannalond okkara. Av tí at hann er so dýrur í rakstri, verður hann bert nýttur við hálvari styrki.

Noreg og Ísland senda t.d. yvir satelitt og stuttbylgju og røkka væl longri, og ivasamt man vera, um fløgan í millumbylgjusendaran í heila tikið var rætt. Hann var sera dýrur at byggja, og hartil er hann lutfalsliga dýrur í rakstri.

Upplýst varð m.a., at stuttbylgjusendarin hjá Íslandi kostar 180 kr. fyri tíman, meðan millumbylgjusendarin, sum kostaði 2,2 mió. kr. í rakstri í fjør, kostar 500 kr. fyri tíman, og sendir tá bert við hálvari styrki.

Útvarpið kennir ikki til nakran áhuga uttaneftir fyri at leiga senditíð, og higartil hava ikki staðist trupulleikar av at latið free-lance sendingar gera í útvarpshúsinum.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hergeir Nielsen, Jógvan A. Johannessen og Helena Dam á Neystabø) heldur ikki, at nakar stórvegis áhugi er fyri at nýta millumbylgjusendaran í Akrabyrgi til onnur endamál, og verður tí ikki tikið undir við uppskotinum.

Minnilutin (Bjarni Djurholm og Terje Davidsen) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

2. viðgerð 27. apríl 1994. Málið fall við 15-0 atkvøðum.

189 Løgtingslóg um keyp av ognini matr. nr. 1aæ, Hoyvík

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars legði Bergur Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um keyp av ognini matr. nr. 1 aæ, Hoyvík.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at keypa ognina matr. nr. 1 aæ, Hoyvík.

§ 2. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna, at taka lán stórt 4,1 mió. kr. til keyp og umbygging av ognini.

§ 3. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om køb af ejendommen matr. nr. 1 aæ, Hoyvík.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at købe ejendommen matr. nr. matr. nr. 1 aæ, Hoyvík.

§ 2. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån stort 4,1 mio. kr. til køb og ombygning af ejendommen.

§ 3. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Landsstýrinum stendur í boði at keypa matr. nr. 1 aæ, Hoyvík fyri 2.0 mió. kr.

Ætlanin er at nýta bygningin til framsýningar og goymslu hjá Føroya Fornminnissavni. Við at keypa bygningin verður goymsluspurningurin hjá Fornminnissavninum loystur og er hetta

eitt veruligt alternativ til vánaligu og ótryggu framsýningarhølini, sum savnið nú hevur.

Við neyðugari innrættan kann akutti tørvurin verða loystur, hóast hetta ikki er loysnin fyri alla framtíð. Har miðað verður ímóti at byggja eitt veruligt tjóðsavn til framsýningar, tá ráðini verða til tess. Men hesin bygningurin verður tá framvegis at nýta til goymslur.

Bygningurin:

Bygningurin hevur eina grundvídd uppá 72,86 x 22,46 = 1636 m² í tveimum hæddum, á einum grundøki, sum er 4.300 m² til víddar. Fermetraprísurin er einans **kr. 611,-**, og er hesin kostnaður lægri enn grundstykkjaprísurin higartil hevur verið.

Sjálvur bygningurin og tekjan eru í góðum standi, meðan hann innan krevur munandi ábøtur, serstakliga brunatekniskar ábøtur. 1/3 av gólvvíddini hevur betongdekk, meðan restin er gjørt úr stálplátum omaná paletthyllum.

Fyri at bygningurin skal gerast nýtiligur til framsýningar og hava eina trygga goymslu, verður neyðugt at gera ávísar broytingar í bygninginum. Fyri at íløgan ikki skal gerast ov stór av brunatekniskum viðurskiftum, verður ein partur av dekkinum yvir goymsluni tikin burtur, men goymslan hevur tá eina fríhædd uppá tvær hæddir. Gólvvíddin verður tá 2676 m².

Kostnaðurin fyri umbyggingina verður umí. **2,1 mió.kr.**, tvs. at samlaða íløgan verður í mesta lagi **4,1 mió. kr.**, tað er 4.100.000 : 2676 = **1.532,- kr./m²**, sum má sigast at verða sera biligt, ella umí. 1/8 av kostnaðinum fyri eitt nýtt savn.

Fyrimunir við keyp av omanfyri nevndu ogn:

- framsýningarhøli og goymsla fáa góð og trygg viðurskifti.
- bygningurin liggur sera væl fyri í mun til fyrisiting og ætlaða útisavnið í Hoyvík.
- arbeiðsviðurskiftini verða munandi betrað.
- allar goymslur og goymsluarbeiði verða undir somu tekju.
- møguleiki at seta upp betri og størri framsýningar enn nú.
- møguleiki fyri serframsýningum.
- fáa møguliga loyvi at taka føroysku gripirnar heim frá Nationalmuseet, t.d kirkjubøstólarnar, rúnasteinar o.a..

Við omanfyri nevndu loysn eru hølistrupulleikarnir hjá Fornminnissavninum loystir langt fram í tíðina, og tá Fornminnissavnið flytur burtur frá Debesartrø, verður ein partur av hølistrupulleikunum á Debesartrø somuleiðis loystur.

Í fleiri ár hava stovnarnir á Debesartrø stríðst við hølisviðurskiftini, tí har er ov trongligt, og nú tá oljufyrisitingin eisini skal húsast á Debesartrø saman við Náttúrugripasavninum, er neyðugt at onkur stovnur flytur burtur frá Debesartrø og er tað ein góð loysn, at hetta verður Fornminnisavnið, sum so er samlað í Hoyvík.

Oljufyrisitingin hevur brúk fyri hølum beinanvegin, tí tær seismisku kanningarnar verða settar í verk í næstum. Ætlanin er, at oljufyrisitingin skal húsast í tí gamla bókasavninum á Debesartrø, men framsýningin hjá Fornminnisavninum má út fyrst.

Sparing í leiguútreiðslum:
Fornminnissavnið hevur í dag eina samlaða leiguútreiðslu uppá **kr. 158.000 árliga,** sum sostatt verður spard komandi árini.

Høli, sum verða tøk á Debesartrø til oljufyrisitingina, náttúrugrípasavnið og seturskrivstovuna hava eitt leiguvirði uppá umt. 200.000,- kr./ár. (gl. bókasavn, bátahøllin og Reinhúsið)

Goymslan hjá Landsskjalasavninum við Velbastaðvegin verður flutt í bygningin í Hoyvík og gevur hetta eina sparing í húsaleigu uppá 120.000,- kr./ár. frá 01.06.1995.

Samlaða sparingin í húsaleigu verður umt. 480.000,- kr./ár.

Sambært hjálagda lánsyvirliti, dagf. 16. mars. 1994, verður tað árliga gjaldið kr. 414.293.-, um lánið verður goldið yvir 20 ár.

Hetta merkir, at tað verður ein nettosparing í húsaútreiðslum, samstundis sum høllini verða munandi betri enn tey núverandi.

Ætlanin er, at umbyggingin verður sett í verk beinanvegin, og fer tað at geva nakað av hart tiltrongdum byggiarbeiði.

1. viðgerð 23. mars 1994. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 22. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1994 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1994 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir miniilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Karl Heri Joensen, Ilergeir Nielsen og Anfinn Kallsberg) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) tekur ikki undir við málinum og setir eingi uppskot fram.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við málinum og hevur hesa viðmerking:

Eingin ivi er um, at Føroya Fornminnissavn hýsast undir trongum viðurskiftum, men fíggjarligu umstøður okkara gera, at vit eru noydd at prioritera.

Minnilutin kann tí ikki taka undir við málinum, men mælir til at taka málið viðv. høllisviðurskiftunum hjá Føroya Fornminnissavni upp aftur í sambandi við eina komandi fíggjarlóg.

2. viðgerð 27. apríl 1994. Málið verð beint aftur í fíggjarnevndina, sum 27. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit II

Undir 2. viðgerð av málinum ynskti fíggjarnevndarformaðurin, at málið verð beint aftur í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið av nýggjum. Undir viðgerðini hevur nevndin hildið fund við Arna Thorsteinsson, stjóra á Føroyska Fornminnissavni, og Jóannes Dalsgaard, stjóra á Føroya Landsskjalasavni.

Fundurin snúði seg um viðmerkingar landsstýrisins til lógaruppskotið, har sagt verður, at goymslan hjá Landsskjalasavninum á Velbastaðvegnum verður flutt í bygningin í Hoyvík. Umboðini fyri Føroya Fornminnissavn og Landsskjalasavnið vóru samd um, at goymslan ikki eigur at verða flutt, og hesum tekur landsstýrismaðurin eisini undir við.

Ein meirilut í fíggjarnevndini (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Karl Heri Joensen, Hergeir Nielsen) tekur undir við, at goymslan hjá Landsskjalasavninum ikki verður flutt niðan í bygningin í Hoyvík saman við Føroya Fornminnissavni. Annars mælir meirilutin framvegis til at samtykkja lógaruppskotið frá landsstýrinum.

Støðan hjá **minnilutanum** (Flemming Mikkelsen) er óbroytt í mun til álit I.

Støðan hjá **minnilutanum** (Tordur J. Niclasen) er somuleiðis óbroytt í mun álit I.

Í fyrra álitinum varð sagt, at Anfinn Kallsberg tók undir við meirilutanum. Hetta var ein villa. **Minnilutin** (Anfinn Kallsberg) tekur støðu í tingsalinum.

3. viðgerð 28. apríl 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 19-0 atkvøðum.

Fl. jnr. 452-3/90.

Lóg nr. 59 frá 10. mai 1994.

190 Løgtingslóg um stýrisskipan Føroya

Ár 1994, hósdagin 24. mars legði løgmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um stýrisskipan Føroya.

Inngangur

§ 1. Í yvirtiknum málum er lóggávuvaldið hjá løgtinginum og løgmanni í felag. Útinnandi valdið er hjá landsstýrinum. Dómsvaldið er hjá dómsstólunum.

Lóggávuvaldið

§ 2. Løgtingið er ting við í mesta lagi 32 tingmonnum.

§ 3. Valrætt til løgtingið hevur hvør, ið fylt hevur 18 ár, hevur danskan heimarætt og er heimahoyrandi í Føroyum, uttan so er, at hann er gjørdur ómyndugur.

§ 4. Valbærur er hvør, sum hevur valrætt til løgtingið, uttan so er, at hann er revsaður fyri gerð, sum hevur við sær, at hann eftir almannahugsan ikki er verdugur at sita á tingi.
Stk. 2. Tann, ið dømdur er fyri revsiverda gerð, verður ikki óverdugur til tingsess, uttan so, at hann fær treytaleysan fongsulsdóm í 4 mánaðir ella longri, ella trygdarvarðhaldsdóm.
Stk. 3. Heldur ikki er hann óverdugur, tá ið 5 ár eru liðin frá tí, at revsingin er avsitin, fyrnd, ella eftirgivin ella frá endaligari leysgeving úr trygdarvarðhaldi.

§ 5. Løgtingið verður valt á almennum, loyniligum og beinleiðis vali.

lagtingslov om Færøernes styrelsesordning.

Indledning

§ 1. Den lovgivende magt i overtagne anliggender er hos lagtinget og lagmanden i forening. Den udøvende magt er hos landsstyret. Den dømmende magt er hos domstolene.

Den lovgivende magt

§ 2. Lagtinget udgør een forsamling bestående af højst 32 medlemmer.

§ 3. Valgret til lagtinget har enhver, der er fyldt 18 år, har dansk indfødsret og er hjemmehørende på Færøerne, medmindre vedkommende er umyndiggjort.

§ 4. Valgbar er enhver, som har valgret til lagtinget, medmindre vedkommende er straffet for en handling, der i almindeligt omdømme gør ham uværdig til at være medlem af lagtinget.
Stk. 2. Den, der er dømt for en strafbar handling, er ikke uværdig til lagtingsmandat, med mindre domfældte er idømt ubetinget straf af fængsel i 4 måneder eller derover eller forvaring.
Stk. 3. Ej heller er den dømte uværdig, når der er forløbet 5 år fra straffens udståelse, forældelse eller eftergivelse eller fra den endelige løsladelse fra forvaring.

§ 5. Lagtinget vælges ved almindelige, hemmelige og direkte valg.

Stk. 2. Nærri reglur um at inna valrættin verða givnar í løgtingsvallógini, heruppií at áseta løgtingsmannatalið innan fyri tað hámark, ið ásett er í § 2.

§ 6. Løgtingsmenn verða valdir fyri fýra ár í senn.
Stk. 2. Løgtingið eins væl og løgmaður kunnu, nær ið vera skal, skriva út nýval, sum hevur við sær, at tey løgtingsumboð, ið verið hava, falla burtur, tá ið nývalda løgtingið er sett.
Stk. 3. Tað áliggur løgmanni at skipa so fyri, at nýval verður hildið, áðrenn valskeiðið er runnið.
Stk. 4. Løgtingsmaður, sum missir valhæri sítt, fer úr tingsessinum.

§ 7. Løgtingið ger sjálvt av, um val tingmanna hevur gildi, og spurningin um, hvørt tingmaður hevur mist valhæri sítt.

§ 8. Tá ið góðkent er, at løgtingsmaður er valdur, skal hann leggja frá sær øll álitisstørv í nevndum, ráðum o.t., sum eru undir eftirliti landsstýrisins ella, sum landsstýrið hevur skipað hann í, sessur í bý-, ella bygda(r)ráði tó undantikin.

§ 9. Nývalda løgtingið kemur saman til fundar kl. 10.00 tólvta yrkadag eftir valdagin, uttan so er, at løgmaður ikki longu hevur boðað til fundar ella fyri veður hevur flutt fundin fram.
Stk. 2. Tá ið valbrøvini eru góðkend, verður løgtingið sett, og valdir verða løgtingsformaður og næstformenn fyri alt valskeiðið.

§ 10. Løgtingssetan byrjar ólavsøkudag og heldur á til ólavsøkudag árið eftir.
Stk. 2. Ólavsøkudag ganga løgtingsmenn, løgmaður, landsstýrismenn og embætismenn skrúðgongu úr tinginum í dómkirkjuna, har gudstænasta verður hildin, og síðan aftur í tingið. Løgtingsformaðurin ger av,

Stk. 2. De nærmere regler for valgrettens udførelse gives ved lagtingsvalgloven, herunder at fastsætte antallet af lagtingsmedlemmer indenfor det i § 2 fastsatte højeste antal.

§ 6. Lagtingets medlemmer vælges for fire år.
Stk. 2. Såvel lagtinget som lagmanden kan til enhver tid udskrive nyvalg med den virkning, at de bestående lagtingsmandater bortfalder, når det nyvalgte lagting er sat.
Stk. 3. Det påhviler lagmanden at foranledige, at nyvalg afholdes inden valgperiodens udløb.
Stk. 4. Mister et medlem af lagtinget sin valgbarhed, bortfalder dennes mandat.

§ 7. Lagtinget afgør selv gyldigheden af sine medlemmers valg samt spørgsmål om, hvorvidt et medlem har mistet sin valgbarhed.

§ 8. Når valget af et lagtingsmedlem er godkendt, skal medlemmet nedlægge alle hverv i nævn, råd o.l., som er under tilsyn af landsstyret eller, hvor medlemmet er beskikket til hvervet af landsstyret, mandat i by- eller bygderåd dog undtaget.

§ 9. Det nyvalgte lagting træder sammen kl. 10.00 den tolvte søgnedag efter valgdagen, dersom lagmanden ikke har indkaldt det til møde forinden eller på grund af vejrforholdene har udsat mødet.
Stk. 2. Straks efter prøvelsen af mandaterne sættes lagtinget ved valg af lagtingsformand og næstformænd for hele valgperioden.

§ 10. Lagtingsåret begynder Olajdag og varer til Olajdag det følgende år.
Stk. 2. Olajdag går lagtingsmænd, lagmanden, medlemmer af landsstyret og embedsmænd i procession fra lagtinget til og fra domkirken, hvor der afholdes gudstjeneste. Lagtingsformanden fastsætter,

hvør er við í skrúðgonguni, og hvussu gongan er skipað.
Stk. 3. Løgtingið verður sett allur ólavsøkudag kl. 13.00.

§ 11. Samkomustaður løgtingsins er Tórshavn. Í serstøkum føri kann løgtingið tó koma saman til fundar á øðrum staði í landinum.

§ 12. Á ólavsøkufundinum greiðir løgmaður frá støðu landsins og tí, ið landsstýrið hevur í ætlan at fremja.

Stk. 2. Við støði í røðu løgmans tekur tingið innan 6 yrkadagar støðu landsins til umrøðu.

§ 13. Løgtingsformaðurin boðar til løgtingsfundar og kunnger samstundis dagsskrá. Formaðurin hevur skyldu til at boða til fundar uttan óneyðuga dvøl, um so er, at í minsta lagi tveir fimtingar av tingmonnum ella løgmaður skriviliga biðja um tingfund við dagsskrá.

§ 14. Løgmaður, landsstýrismenn og ríkisumboðsmaður hava embætis vegna, uttan atkvøðurætt, atgongd at løgtinginum, og hava rætt til á fundum at krevja at koma til orðanna, men skulu annars halda tingskipanina.

§ 15. Løgmanni, landsstýrismonnum og løgtingsmonnum eru heimilað at seta fram uppskot til løgtingslógir, ríkislógartilmæli og aðrar samtyktir.
Stk. 2. Uppskot til løgtingslóg ella ríkislógartilmæli kann ikki verða endaliga samtykt, uttan at tað hevur fingið tríggjar viðgerðir á løgtingi.
Stk. 3. Um nýval verður, ella tá ið løgtingsseta er lokin, falla burtur øll tey uppskot til løgtingslógir, ríkislógartilmæli og aðrar samtyktir, sum ikki frammanundan eru endaliga samtykt.

hvem der deltager i processionen, og i hvilken orden, der bliver gået.
Stk. 3. Lagtinget sættes påny Olajdag kl. 13.00.

§ 11. Lagtinget træder sammen i Tórshavn. I overordentlige tilfælde kan lagtinget dog samles andetsteds på Færøerne.

§ 12. På Olajmødet afgiver lagmanden en redegørelse for landets almindelige stilling og de af landsstyret påtænkte foranstaltninger.
Stk. 2. På grundlag af den af lagmanden afgivne redegørelse finder inden 6 søgnedage en almindelig forhandling sted.

§ 13. Lagtingsformanden indkalder lagtinget til møde med angivelse af dagsorden. Det påhviler formanden at indkalde til møde uden ugrundet ophold, når mindst to femtedele af lagtingets medlemmer eller lagmanden skriftlig fremsætter begæring herom med angivelse af dagsorden.

§ 14. Lagmanden, landsstyremedlemmerne og rigsombudsmanden har i embeds medfør, uden stemmeret, adgang til lagtinget, og er berettigede til under forhandlingerne at forlange ordet, idet de iøvrigt iagttager forretningsordenen.

§ 15. Lagmanden og de øvrige medlemmer af landsstyret samt ethvert medlem af lagtinget er berettiget til at fremsætte forslag til lagtingslove, beslutninger vedrørende rigslovgivning og andre beslutninger.
Stk. 2. Et lagtingslovsforslag eller forslag til beslutning vedrørende rigslovgivning kan ikke endelig vedtages, forinden det tre gange har været behandlet i lagtinget.
Stk. 3. Ved nyvalg, og ved lagtingsårets udgang, bortfalder alle forslag til lagtingslove, beslutninger vedrørende rigslovgivning og andre beslutninger, der ikke forinden er endelig vedtaget.

§ 16. Løgtingið sjálvt ásetur tingskipan sína, sum inniheldur nærri reglur um málsgongd og skilhald.

§ 17. Løgtingsfundir eru almennir. Útvarpi og sjónvarpi er frítt at senda beinleiðis av fundunum. Løgtingið kann tó í einstøkum førum samtykkja viðgerð aftan stongdar dyr.

§ 18. Løgtingið kann ikki taka avgerð um mál, uttan at meira enn helmingur av tingmonnum er á fundi.
Stk. 2. Løgtingsmál er samtykt, tá ið fleiri atkvøður eru fyri enn ímóti, um ikki annað er ásett í hesi løgtingslóg.

§ 19. Løgtingið kann skipa nevndir av tingmonnum at kanna alment umvarðandi mál. Nevndirnar hava rætt at krevja skrivligar ella munnligar upplýsingar frá einskildum borgarum eins væl og frá almennum embætismonnum.

§ 20. Løgtingið velur limir í nevndir og størv við lutfalsvali.

§ 21. Heimilt er hvørjum løgtingsmanni við tingsins loyvi at leggja fram til viðgerðar eitt og hvørt alment mál og tí viðvíkjandi krevja frágreiðing frá løgmanni ella landsstýrismanni.
Stk. 2. Sama rætt hevur løgtingsmaður, um ein triðingur av tingmonnum á fundi tekur undir.

§ 22. Eingin umsókn verður løgd fyri løgtingið, uttan at tingmaður ella landsstýrið flytur hana fram.

§ 23. Løgtingsmenn eru bert bundnir av sannføring síni og ikki av forskriftum frá veljarum sínum.

§ 16. Lagtinget fastsætter selv sin forretningsorden, der indeholder de nærmere bestemmelser vedrørende forretningsgang og ordens opretholdelse.

§ 17. Lagtingets møder er offentlige. Radio og tjernsyn er berettiget til at transmittere direkte fra møderne. Lagtinget kan dog i enkelte tilfælde beslutte, at en sag skal behandles for lukkede døre.

§ 18. Lagtinget kan kun tage beslutning, når over halvdelen af medlemmerne er tilstede.
Stk. 2. Forslag i lagtinget er vedtaget, når der er flere stemmer for end mod forslaget, såfremt ikke andet er fastsat i denne lagtingslov.

§ 19. Lagtinget kan nedsætte kommissioner af sine medlemmer til at undersøge almenvigtige sager. Kommissionerne er berettigede til at fordre skriftlige eller mundtlige oplysninger såvel af private borgere som af offentlige myndigheder.

§ 20. Lagtingets valg af medlemmer i kommissioner og hverv sker ved forholdsvalg.

§ 21. Ethvert lagtingsmedlem kan med lagtingets samtykke bringe ethvert offentligt anliggende under forhandling og derom æske lagmandens eller et landsstyremedlems forklaring.
Stk. 2. Samme ret har lagtingsmedlem såfremt en trediedel af de fremmødte lagtingsmedlemmer billiger dette.

§ 22. Intet andragende må overgives lagtinget uden gennem dets medlemmer eller landsstyret.

§ 23. Lagtingsmedlemmerne er ene bundet ved deres overbevisning og ikke ved nogen forskrift af deres vælgere.

§ 24. Eingin løgtingsmaður má uttan samtykki løgtingsins verða ákærdur ella fongslaður á nakran hátt, uttan so at hann verður tikin á búri.
Stk. 2. Eingin løgtingsmaður kann uttan samtykki tingsins verða kravdur til svars uttantings fyri tað, hann hevur sagt innantings.

§ 24. Intet medlem af lagtinget kan uden dettes samtykke tiltales eller underkastes fængsling af nogen art, medmindre medlemmet er grebet på færsk gerning.
Stk. 2. For sine ytringer i lagtinget kan intet af dets medlemmer uden lagtingets samtykke drages til ansvar udenfor samme.

§ 25. Samsýning løgtingsmanna verður ásett við løgtingslóg.

§ 25. Lagtingets medlemmer oppebærer et vederlag, hvis størrelse fastsættes ved lagtingslov.

§ 26. Løgtingslógaruppskot, ið løgtingið hevur samtykt, fær lógargildi, tá ið tað seinast 30 dagar eftir endaligu samtyktina er staðfest av løgmanni og kunngjørt samtbært kunngerðarreglum ásettum í løgtingslóg.

§ 26. Et af lagtinget vedtaget forslag til lagtingslov får lovskraft, når det senest 30 dage efter den endelige vedtagelse er stadfæstet af lagmanden og kundgjort i henhold til kundgørelsesregler fastsat ved lagtingslov.

Útinnandi valdið

Den udøvende magt

§ 27. Í landsstýrinum sita løgmaður og minst tveir landsstýrismenn.
Stk. 2. Løgmaður verður tilnevndur eftir teirri skipan, sum ásett er í § 28. Løgmaður ásetur, hvussu nógvir landsstýrismenninir skulu vera, og tilnevnir teir.

§ 27. Landsstyret består af lagmanden og mindst to landsstyresmedlemmer.
Stk. 2. Lagmanden udnævnes efter de i § 28 fastsatte regler. Lagmanden fastsætter antallet af landsstyresmedlemmer og foretager udnævnelsen af dem.

§ 28. Tá ið løgmaður skal verða tilnevndur, boðar løgtingsformaðurin formonnunum fyri flokkunum, ið umboðaðir eru á løgtingi, hvørjum sær til samráðs.
Stk. 2. Innan 10 yrkadagar eftir at fráfarandi løgmaður hevur biðið um at verða loystur úr embæti, leggur løgtingsformaður uppskot um løgmansevni fyri løgtingið. Um løgtingsval verður, ella løgmaður doyr, gongur freistin ávikavist frá tí degi, fyrsti tingfundur var eftir valið, ella frá tí degi, ið løgmaður doyði.
Stk. 3. Løgtingið skal í seinasta lagi 4. yrkadagin eftir, uttan nevndarviðgerð, greiða atkvøðu um uppskotið. Atkvøður meiri enn helmingur av øllum tingmonnum ímóti uppskotinum, er tað fallið. Annars er tað samtykt.

§ 28. Når en lagmand skal udnævnes, tilkalder lagtingsformanden formanden for hvert af de i lagtinget repræsenterede partier hver for sig til samråd.
Stk. 2. Lagtingsformanden fremlægger inden 10 søgnedage efter, at den afgående lagmand anmodede om sin afsked, for lagtinget forslag til lagmand. I de tilfælde, hvor der afholdes lagtingsvalg, eller lagmanden dør, løber fristen fra henholdsvis den dag, lagtinget afholdt sit første møde efter valget eller lagmandens dødsdag.
Stk. 3. Lagtinget skal senest 4. søgnedagen herefter, uden udvalgsbehandling, prøve forslaget ved afstemning. Stemmer mere end halvdelen af det samlede antal lagtingsmedlemmer mod forslaget, er det forkastet. Ellers er det vedtaget.

Stk. 4. Havnar løgtingið uppskoti frá løgtingsformanninum um løgmansevni, boðar formaðurin aftur til samráðs sambært stk. 1 og setur innan 4 yrkadagar eftir at uppskot hansara var havnað framaftur uppskot um løgmansevni, sum løgtingið sama dag greiðir atkvøðu um eftir reglunum í stk. 3.

Stk. 5. Um so er, at løgtingið fýra ferðir hevur felt uppskot løgtingsformansins um løgmann, skrivar starvandi løgmaður út nýval til løgtingið.

§ 29. Loystur skal verða úr embæti løgmaður ella landsstýrismaður, ið biður um tað. Løgtingsformaðurin loysir løgmann úr embæti, og løgmaður loysir landsstýrismann úr embæti.

Stk. 2. Løgmaður kann eisini í øðrum førum loysa úr embæti landsstýrismann og skal loysa landsstýrismann úr embæti, um tað við atkvøðugreiðslu í løgtinginum, har ið meira enn helmingur av øllum tingmonnum atkvøður fyri, verður samtykt, at løgtingið ikki longur hevur álit á landsstýrismanni.

§ 30. Um tað við atkvøðugreiðslu á løgtingi, har ið meira enn helmingur av øllum tingmonnum atkvøðir fyri, verður samtykt, at løgtingið ikki longur hevur álit á løgmanni, skal løgmaður biðja løgtingsformannin loysa seg úr embæti.

§ 31. Hevur løgmaður biðið um at verða loystur úr embæti sbr. § 29, ella løgtingið hevur váttað honum misálit sbr. § 30, starvar landsstýrið, til nýggjur løgmaður er tilnevndur. Í tíðarbilinum fram til, at nýggjur løgmaður er tilnevndur, kann landsstýrið ikki gera annað enn tað, sum er alneyðugt, til tess at fyrisitingin kann halda fram ótarnað. Løgmaður kann tó innan eina viku eftir, at hann fekk misálit, nýta heimild sína í § 6, stk. 2, at skriva út nýval.

§ 32. Nærri reglur um setingarviðurskifti

Stk. 4. Forkaster lagtinget lagtingsformandens forslag til lagmand tilkalder lagtingsformanden pány til samråd jfr. stk. 1 og fremlægger forinden 4 søgnedage efter at hans forrige forslag var forkastet pány forslag til lagmand som lagtinget samme dag prøver ved afstemning efter reglerne i stk. 3.

Stk. 5. Säfremt lagtinget tire gange har forkastet lagtingsformandens forslag til lagmand, udskrives der af den fungerende lagmand nyvalg til lagtinget.

§ 29. Lagmanden eller et landsstyresmedlem skal afskediges, säfremt den pågældende fremsætter begæring herom. Lagmanden afskediges af lagtingsformanden og medlemmerne af landsstyret af lagmanden.

Stk. 2. Lagmanden kan også i andre tilfælde afskedige et landsstyresmedlem og skal gøre det, säfremt det ved afstemning i lagtinget, hvor mere end halvdelen af samtlige lagtingsmedlemmer stemmer for, vedtages, at lagtinget ikke længere har tillid til den pågældende.

§ 30. Säfremt der ved afstemning i lagtinget, hvor mere end halvdelen af samtlige lagtingsmedlemmer stemmer for, vedtages, at lagtinget ikke længere har tillid til lagmanden, skal denne anmode lagtingsformanden om sin afsked.

§ 31. Har lagmanden begæret sin afsked jfr. § 29, eller har lagtinget udtalt, at det ikke længere har tillid til ham jfr. § 30, fungerer landsstyret, til en ny lagmand er udnævnt. I tiden indtil den nye lagmand er udnævnt, kan landsstyret kun foretage sig, hvad der er særdeles fornødent til administrationens uforstyrrede førelse. Lagmanden kan dog inden en uge efter, at lagtinget udtalte sin mistillid til ham, udskrive nyvalg i henhold til § 6, stk. 2.

§ 32. De nærmere regler om lagmanden

løgmans og landsstýrismanna verða ásettar í løgtingslóg.

§ 33. Løgmaður býtir málsøki landsstýrisins millum landsstýrismenninar. Teir sita fyri málsøkjum sínum hvør sær.
Stk. 2. Løgmaður samskipar starv landsstýrismanna og boðar í hesum sambandi regluliga til landsstýrisfunda, har m.a. øll uppskot landsstýrisins til løgtingslógir, ríkislógartilmæli og eykajáttanir verða framløgd áðrenn tey verða løgd fyri løgtingið.
Stk. 3. Løgmaður hevur eftirlit við, at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt.

§ 34. § 1 í hesi løgtingslóg er ikki til hindurs fyri, at landsstýrið ella stovnur undir landsstýrinum í nærri ásetan mun, við løgtingslóg fær heimild til við kunngerð at ásetta rættarreglur av almennum slagi. Ein tílík heimild kann ikki verða treytað av, at reglurnar, sum ásettar verða, skulu hava góðkenning frá umboðum løgtingsins.

§ 35. Hóast § 1 kann við løgtingslóg í nærri ásettan avmarkaðan mun heimild verða latin nevndum, stýrum og ráðum at taka endaligar fyrisitingarligar avgerðir.
Stk. 2. Løgtingið kann ikki velja limir í nevndirnar, stýrini ella ráðini, sum umrødd eru í stk. 1.

§ 36. Løgmaður ger av, hvør av landsstýrismonnunum er varaløgmaður og røkir heimildir løgmans, meðan hann hevur forfall. Er einki ásett, verða heimildir hansara røktar av tí landsstýrismanni, sum longst hevur sitið í embætti. Hava tveir landsstýrismenn sitið líka leingi, tekur hin eldri við heimildunum.

§ 37. Løgmaður og landsstýrismenn hava

og landsstyresmedlemmernes ansættelsesforhold fastsættes ved lagtingslov.

§ 33. Lagmanden bestemmer forretningernes fordeling imellem landsstyrets medlemmer. Disse administrerer deres sagsområder hver for sig.
Stk. 2. Lagmanden koordinerer landsstyrets arbejde og indkalder i denne forbindelse regelmæssigt til landsstyresmøder hvor bl.a alle landsstyrets forslag til lagtingslove, beslutninger vedrørende rigslovgivning og tillægsbevillinger forelægges forinden de fremlægges for lagtinget.
Stk. 3. Lagmanden udøver tilsyn med, at hver enkelt landsstyresmedlem administrerer sine sagsanliggender på lovlig og forsvarlig vis.

§ 34. Ved lagtingslov kan uanset bestemmelsen i § 1 gives landsstyret eller en af dettes institutioner i et nærmere bestemt omfang bemyndigelse til ved kundgørelse at fastsætte retsregler af generel karakter. En sådan bemyndigelse kan ikke gives med det vilkår, at regelfastsættelsen skal ske efter godkendelse af repræsentanter for lagtinget.

§ 35. Ved lagtingslov kan, uanset bestemmelsen i § 1, i nærmere bestemt begrænset omfang, henlægges bemyndigelser til nævn, bestyrelser og råd til at udøve endelige forvaltningsafgørelser.
Stk. 2. Lagtinget kan ikke vælge medlemmer i de i stk. 1 omhandlede nævn, bestyrelser eller råd.

§ 36. Lagmanden fastsætter, hvem af landsstyrets medlemmer er vicelagmand, og varetager lagmandens funktioner under forfald. Er intet fastsat, udøves lagmandens funktioner af det medlem af landsstyret, der har størst anciennitet. Har to medlemmer af landsstyret lige anciennitet, har den ældste fortrinsret.

§ 37. Lagmanden og de øvrige medlemmer

rættarliga ábyrgd av fyrisitingini av teim málsøkjum, sum løgd eru til teirra. Mál viðvíkjandi hesi rættarligu ábyrgd verða dømd av nevningatingi. Greiniligari reglur um hesa ábyrgd verða at áseta við løgtingslóg.

§ 38. Løgtingið setur eina tríggja manna nevnd av løgtingsmonnum at hava eftirlit við, at starv landsstýrisins verður útint á lógligan hátt.
Stk. 2. Hevur nevndin illgruna um, at óregluliga hevur verið atborið, kann hon krevja, at løgtingsformaðurin setur ein kanningarstjóra, sum ikki hevur dómsmyndugleika. Hann skal, eftir at hann hevur kannað málið, gera eina frágreiðing til løgtingið, hvørt fyrisitingin í ávísum máli er útint á lógligan hátt. Ein triðingur av løgtingsmonnunum kann skrivliga seta fram sama krav.
Stk. 3. Kanningarstjórin skal hava løgfrøðiligt embætisprógv og skal ikki verða starvsettur í fyrisiting landsstýrisins, á stovni undir landsstýrinum, hjá dómsvaldinum ella fyrr hava viðgjørt málið.
Stk. 4. Kanningarstjórin hevur rætt til at krevja skrivligar ella munnligar upplýsingar frá einskildum borgarum eins og frá almennum embætismonnum.

af landsstyret har det retlige ansvar for administrationen af det sagsområde, der er tillagt dem. Sager vedrørende dette retlige ansvar pådømmes ved nævningeting. De nærmere regler om ansvaret fastsættes ved lagtingslov.

§ 38. Lagtinget nedsætter af sin midte et udvalg på tre medlemmer til at have tilsyn med, at landsstyrets virksomhed foregår på lovlig vis.
Stk. 2. Såfremt udvalget får mistanke om, at uregelmæssigheder har fundet sted, kan det kræve, at lagtingsformanden udpeger en undersøgelsesleder. Den pågældende, der ikke har dømmende myndighed, skal efter stedfunden undersøgelse udarbejde en redegørelse til lagtinget, om administrationen af en konkret sag har været foretaget på lovlig vis. En tredjedel af lagtingets medlemmer kan skriftligt fremsætte samme krav.
Stk. 3. Undersøgelseslederen skal have juridisk embedseksamen og må ikke være ansat i landsstyrets administration, i en af dets institutioner, ved domstolene eller tidligere have beskæftiget sig med den pågældende sag.
Stk. 4. Undersøgelseslederen er berettiget til at fordre skriftlige eller mundtlige oplysninger såvel af private borgere som af offentlige myndigheder.

Dómsvaldið

§ 39. Dómsvaldið er hjá óheftum dómstólum, sum virka sambært rættargangslógini fyri Føroyar.

Den dømmende magt

§ 39. Den dømmende magt er hos uafhængige domstole, som udøver deres virksomhed i henhold til retsplejeloven for Færøerne.

Fíggjarmál landsins

§ 40. Eingin beinleiðis ella óbeinleiðis skattur má verða álagdur, broyttur ella avtikin uttan við løgtingslóg.
Stk. 2. Beinleiðis ella óbeinleiðis skattur kann ikki verða álagdur fyri inntøkur, innflutning, útflutning, sølu, gjald ella

Landets finanser

§ 40. Ingen direkte eller indirekte skat kan pålægges, forandres eller ophæves uden ifølge lagtingslov.
Stk. 2. Ingen direkte eller indirekte skatter kan pålægges for indtægter, indførsel, udførsel, salg, betaling eller lignende, som er

tílíkt, sum er farið fram í tíðini, áðrenn løgtingslógaruppskot um hetta var lagt fyri løgtingið.
Stk. 3. Áðrenn løgtingsfíggjarlóg ella bráðfeingis fíggjarlóg er samtykt á løgtingi, er ikki loyvt at krevja inn teir skattir, ið nevndir eru í stk. 1.

§ 41. Lán ella borgan o.a.m. ið skuldbindur løgting, landsstýri ella stovnar undir landinum, kann ikki verða tikið ella veitt uttan við heimild í løgtingslóg.

§ 42. Fyri 1. oktober á hvørjum ári leggur landsstýrið fyri løgtingið uppskot um løgtingsfíggjarlóg fyri komandi almanakkaár.
Stk. 2. Eingin útreiðsla má verða goldin, uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg, ið er í gildi, tá ið ávíst verður. Tó kann í tíðarskeiðinum fram til 1. apríl, eftir at fíggjarárið er endað, verða ávístur peningur av farnu fíggjarlógini fyri útreiðslur, ið havdar eru í farna fíggjarári.
Stk. 3. Um útlit eru til, at uppskot til fíggjarlóg ikki er liðugt viðgjørt fyri fíggjarársbyrjan, leggur landsstýrið fram uppskot um eina bráðfeingis játtanarlóg.

§ 43. Eykajáttan verður veitt við løgtingslóg.
Stk. 2. Um mál hevur skund, kann fíggjarnevnd løgtingsins, um meirilutin av nevndarlimunum atkvøður fyri, eftir uppskoti frá landsstýrinum veita eykajáttan.
Stk. 3. Eykajáttanir, sum fíggjarnevndin hevur veitt ígjøgnum árið, verða at góðkenna við eykafíggjarlóg í seinasta lagi 31. desember sama ár.

§ 44. Landskassaroknskapurin skal verða lagdur fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok.
Stk. 2. Løgtingið velur nakrar grannskoðarar. Teir fara ígjøgnum árliga landskassaroknskapin og ansa eftir, at allar inntøkur

foregået i tiden, før forslag til lagtingslov herom var fremlagt i lagtinget.
Stk. 3. Forinden lagtingsfinansloven, eller en midlertidig bevillingslov er vedtaget af lagtinget, må de i stk. 1 nævnte skatter ikke opkræves.

§ 41. Lån eller kaution m.v., som forpligter lagtinget, landsstyret eller institutioner under landet, kan kun optages eller ydes med hjemmel i lagtingslov.

§ 42. Landsstyret skal hvert år inden den 1. oktober fremsætte forslag for lagtinget til lagtingsfinanslov for det kommende kalenderår.
Stk. 2. Ingen udgift må afholdes, som ikke har hjemmel i den på anvisningstiden gældende finanslov. Dog kan i tidsrummet frem til 1. april efter finansårets udløb, anvises udgifter, afholdt i sidste finansår, som måtte være bevilgede på finansloven for det forløbne år.
Stk. 3. Kan behandlingen af finanslovforslag ikke forventes tilendebragt inden finansårets begyndelse, skal landsstyret fremsætte forslag til en midlertidig bevillingslov.

§ 43. Tillægsbevilling ydes ved lagtingslov.
Stk. 2. Såfremt en sag er af hastende karakter, kan lagtingets finansudvalg, såfremt flertallet af udvalgets medlemmer stemmer for, efter forslag fra landsstyret yde en tillægsbevilling.
Stk. 3. Tillægsbevillinger, som finansudvalget yder i løbet af året, skal godkendes i en tillægsbevillingslov senest 31. december samme år.

§ 44. Landskassens regnskab skal fremlægges for lagtinget senest seks måneder efter finansårets udløb.
Stk. 2. Lagtinget vælger et antal revisorer. Disse gennemgår landskassens årlige regnskab og påser, at samtlige landets indtæg-

landsins eru settar í roknskapin, og at eingin útreiðsla er goldin uttan heimild í fíggjarlógini ella aðrari játtanarlóg. Teir kunnu krevja at fáa allar upplýsingar og øll skjøl, ið teimum tørvar. Greiniligari reglur um, hvussu mangir grannskoðarar skulu vera, og um virki teirra, verða ásettar í løgtingslóg.

Stk. 3. Landskassaroknskapurin við viðmerkingum grannskoðaranna verður lagdur fyri løgtingið til samtyktar.

Stk. 4. Reglurnar í stk. 1-3 verða eisini nýttar fyri roknskapir hjá almennum stovnum, sum hava sjálvstøðugan roknskap.

ter er opført deri, og at ingen udgift er afholdt uden hjemmel i finansloven eller anden bevillingslov. De kan fordre sig alle fornødne oplysninger og aktstykker meddelt. De nærmere regler for revisorernes antal og virksomhed fastsættes ved lagtingslov.

Stk. 3. Landskassens regnskab med revisorernes bemærkninger forelægges lagtinget til beslutning.

Stk. 4. Reglerne i stk. 1-3 anvendes også for de offentlige institutioner, der fører et selvstændigt regnskab.

Felagsmál

§ 45. Eftir avgerð heimastýrisins verða mál yvirtikin sambært løgtingslóg.

Fællesanliggender

§ 45. Overtagelse af et anliggende i h.t. hjemmestyrets bestemmelse sker ved lagtingslov.

§ 46. Áheitan á ríkismyndugleikarnar um at seta í gildi fyri Føroyar ríkislóg ella kongliga fyriskipan, sum setur í gildi ríkislóg fyri Føroyar, kann bert verða gjørd við ríkislógartilmæli.

§ 46. Indstilling til rigsmyndighederne om ikraftsættelse af rigslovgivning på Færøerne, hvadenten det sker som en egentlig rigslov eller som en kongelig anordning om ikraftsættelse for Færøerne af en rigslov, kan kun ske ved beslutning om indstilling til rigsmyndighederne om ikraftsættelse (beslutning vedrørende rigslovgivning).

§ 47. Uppskot til ríkislógartilmæli, ið løgtingið hevur samtykt, fær gildi, tá ið tað seinast 30 dagar eftir endaligu samtyktina er staðfest av løgmanni og sent ríkismyndugleikunum.

§ 47. Et af lagtinget vedtaget forslag til beslutning vedrørende rigslovgivning får gyldighed, når det senest 30 dage efter den endelige vedtagelse er stadfæstet af lagmanden og oversendt rigsmyndighederne.

§ 48. Landsstýrið ummælir tey uppskot til kongligar fyriskipanir, sum ikki seta ríkislóg í gildi í Føroyum. Hetta geldur somuleiðis fyri allar kunngerðir, sum ráðharri sendir heimastýrinum við atliti at gildisseting í Føroyum.

Stk. 2. Landsstýrið ummælir somuleiðis uppskot til ríkislógir, ið veita ávísum navngivnum persónum heimarætt í danska

§ 48. Landsstyret udtaler sig om sådanne forslag til kongelige anordninger, der ikke sætter rigslovgivning i kraft på Færøerne. Det samme gælder alle de bekendtgørelser, som et ministerium oversender med henblik på eventuel ikraftsættelse på Færøerne.

Stk. 2. Landsstyret udtaler sig på samme måde om forslag til rigslove, der meddeler

ríkinum.

§ 49. Um heimild við ríkislóg ella við kongligari fyriskipan er løgd til heimastýrið, verða almennar reglur sambært slíkari heimild at áseta við løgtingslóg: í øðrum førum liggur heimildin hjá landsstýrinum.
Stk. 2. Í teimum førum, sum heimild er løgd heimastýrinum í kunngerð frá ráðharra, er hon hjá landsstýrinum.

§ 50. Landsstýrið umboðar heimastýrið mótvegis ríkismyndugleikunum.
Stk. 2. § 51, stk. 2 og 3, galda á sama háttur í hesum førum.

Millumtjóðasáttmálar

§ 51. Landsstýrið hevur málsrøði í førum, sum heimastýrinum er heimilað at tingast við og gera avtalur við onnur lond.
Stk. 2. Uttan samtykki løgtingsins kann landsstýrið tó ikki gera avtalur, sum krevja luttøku løgtingsins fyri at verða útintar, ella sum annars eru týdningarmiklar.
Stk. 3. Samstundis sum slík avtala verður løgd fyri løgtingið til góðkenningar, boðar landsstýrið frá, hvørjar løgtingslógir og hvørji ríkislógartilmæli, neyðug eru til tess, at millumlandasáttmálin kann verða útintur.

§ 52. Landsstýrið ummælir heimastýrisins vegna teir millumtjóðasáttmálar, sum ríkismyndugleikarnir leggja fyri heimastýrið til ummælis.
Stk. 2. § 51, stk. 2 og 3, galda á sama hátt í hesum førum.

§ 53. Løgtingið velur millum løgtingsmenn sína uttanlandsnevnd við sjey limum, sum landsstýrið ráðførir seg við í spurningum sum hava stóran uttanlandspolitiskan týdn-

bestemte navngivne personer dansk statsborgerskab.

§ 49. Såfremt der ved rigslov eller kongelig anordning er henlagt bemyndigelser til hjemmestyret, skal generelle regler fastsættes ved lagtingslov; i andre tilfælde har landsstyret bemyndigelsen.
Stk. 2. Såfremt der ved en ministeriel bekendtgørelse er henlagt bemyndigelser til hjemmestyret, er det landsstyret, der har den pågældende bemyndigelse.

§ 50. Landsstyret repræsenterer hjemmestyret overfor rigsmyndighederne.
Stk. 2. § 51, stk. 2 og 3, er på samme måde gældende i disse tilfælde.

Internationale traktater

§ 51. Såfremt hjemmestyret er tillagt hjemmel til at forhandle med og indgå aftaler med andre lande, udøver landsstyret denne ret på hjemmestyrets vegne.
Stk. 2. Landsstyret kan dog ikke uden lagtingets samtykke indgå nogen aftale, til hvis opfyldelse lagtingets medvirken er nødvendig, eller som iøvrigt er af større betydning.
Stk. 3. Når en sådan aftale fremlægges i lagtinget til godkendelse, skal landsstyret samtidig meddele hvilke lagtingslove og hvilke beslutninger vedrørende rigslovgivning, som er nødvendige for opfyldelse af den pågældende traktat.

§ 52. Landsstyret udtaler sig på hjemmestyrets vegne om de internationale traktater, som rigsmyndighederne forelægger hjemmestyret til udtalelse.
Stk. 2. § 51, stk. 2 og 3, er på samme måde gældende i disse tilfælde.

§ 53. Lagtinget vælger af sin midte et udenlandsnævn på syv medlemmer, med hvilket landsstyret rådfører sig i spørgsmål af større udenlandspolitisk rækkevidde.

ing.
Stk. 2. Somuleiðis skal landsstýrið ráðføra seg við hesa nevnd í sambandi við samráðingar við ríkismyndugleikarnar av stórum týdningi fyri viðurskiftini Føroya og Danmarkar millum.

§ 54. Løgtingslóg, ella partur av løgtingslóg, hevur ikki gildi, um
a) hon gongur ímóti millumtjóðasáttmála, heimastýrið hevur gjørt við onnur lond,
b) hon gongur ímóti millumtjóðasáttmála, Danmørk hevur gjørt við onnur lond, og sum eisini fevnir um Føroyar.

Kommunurnar

§ 55. Rættur kommunanna at skipa egin viðurskifti undir eftirliti landsstýrisins verður ásettur í løgtingslóg, m.a. í hvønn mun kommunur og millumkommunufelagsskapir kunnu skuldbindast við láni, borgan o.ø.m.

Fyriskipanir um gildiskomu

§ 56. Um so er, at løgtingið samtykkir uppskot til broytingar av hesi løgtingslóg, kann samtykta løgtingslógaruppskotið ikki beinanvegin verða staðfest av løgmanni. Hitt soleiðis samtykta løgtingslógaruppskotið skal eftir næsta val verða samtykt óbroytt í fyrstu setu nývalda tingsins, og kann síðan verða staðfest á vanligan hátt av løgmanni.
Stk. 2. Verður heimastýrislógin broytt, kunnu uppskot um at broyta hesa løgtingslóg, orsakað av broytingini í heimastýrislógini, verða samtykt og staðfest eftir vanligum reglum.

§ 57. Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. Samtundis fara úr gildi:
a) Løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948

Stk. 2. På samme måde skal landsstyret rådføre sig med dette udvalg i forbindelse med forhandlinger med rigsmyndighederne af større betydning for forholdet mellem Færøerne og Danmark.

§ 54. En lagtingslov eller en del af en lagtingslov har ikke gyldighed, såfremt
a) den strider imod en international traktat, hjemmestyret har indgået med andre lande,
b) den strider imod en international traktat, Danmark har indgået med andre lande, og som også omfatter Færøerne.

Kommunerne

§ 55. Kommunernes ret til under landsstyrets tilsyn selvstændigt at styre deres anliggender bestemmes ved lagtingslov bl.a i hvilket omfang kommuner og interkommunale selskaber kann forpligtes ved lån, kaution m.v.

Ikrafttrædelsesbestemmelser

§ 56. Såfremt lagtinget vedtager forslag til ændringer i denne lagtingslov, kan det således vedtagne lagtingslovsforslag ikke umiddelbart stadfæstes af lagmanden. Det således vedtagne lagtingslovsforslag skal efter førstkommende valg til lagtinget, i det nyvalgte lagtings første lagtingsår, vedtages uændret og kan derefter stadfæstes på normal vis af lagmanden.
Stk. 2. Såfremt de foreslåede ændringer af denne lagtingslov alene skyldes ændringer i hjemmestyreloven, kan disse vedtages og stadfæstes efter de almindelige regler.

§ 57. Lagtingsloven træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.
Stk. 2. Samtidig ophæves:
a) Lagtingslov nr. 1 af 13. maj 1948 om

um stýrisskipan Føroya í sermálum seinast broytt við løgtingslóg nr. 2 frá 3. januar 1985.

b) Løgtingslóg nr. 2 frá 13. mai 1948 um umboðsvald Føroya.

c) Løgtingslóg nr. 22 frá 22. mai 1962 um millumtinganevnd í fiskimarks- og felagsmarknaðarmálum.

d) § 2, stk. 2. 2. pkt., í løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Føroya løgting seinast broytt við løgtingslóg nr. 68 frá 13. mai 1992.

Færøernes Styrelsesordning i Særanliggender, som senest ændret ved lagtingslov nr. 2 af 3. januar 1985.

b) Lagtingslov nr. 2 af 13. maj 1948 om Færøernes Forvaltning.

c) Lagtingslov nr. 22 af 22. maj 1962 om et siddende lagtingsudvalg i fiskerigrænse- og fælledsmarkedsspørgsmålene.

d) § 2. stk. 2. 2. pkt., i lagtingslov nr. 49 af 20. juli 1978 om valg til Færøernes lagting, som senest ændret ved lagtingslov nr. 68 af 13. maj 1992.

Almennar viðmerkingar:

Á landsstýrisfundi 1. april 1993 samtykti landsstýrið at velja limir í eina nevnd at kanna stýrisskipan Føroya.

Í nevndina vóru valdir:
Kjartan Hoydal, fiskivinnustjóri, Hans Trygvi Henriksen, adv. ft., Sjúrður Rasmussen, adv., Bjørn á Heygum, adv. og Annfinn V. Hansen, adv.

Arbeiðssetningurin hjá nevndini varð settur at verða hesin:

1) at kanna og lýsa lógargrundarlagið undir stýrisskipanini og umboðsvaldinum og gera eina metan av, um henda lóggáva er høskandi longur, herundir arbeiðsbýti millum lóggevandi og útinnandi valdið,
2) at lýsa munin millum landsstýrið sum kollegium og ráðharrastýri,
3) at gera uppskot til stýrisskipan, sum byggir á eitt ráðharrastýri, og í hesum sambandi meta um, hvørji krøv ein tílík skipan setir til umsitingina og kostnaðinum av hesum,
4) at lýsa, hvørjar stýrisskipanarregiugerðir neyðugar eru afturat, um Føroyar skulu hava fult sjálvstýri.

Nevndin hevur latið landsstýrinum álit dagfest 22 desember 1993 og landsstýrið hevur latið løgtingsmonnum eintak av hesum.

Løgmaður heitti síðani á allar politisku flokkarnar og bað teir siga sína hugsan um uppskot nevndarinnar.

Við støði í álitinum og toimum viðmerkingum, sum landsstýrið hevur fingið, hevur landsstýrið samtykt at leggja fyri løgtingið frammanfyri standandi uppskot til løgtingslóg um stýrisskipan Føroya.

Uppskot landsstýrisins er í stóran mun samsvarandi uppskoti nevndarinnar. Tó hevur landsstýrið ikki tikið við nakrar av ástingunum í nevndaruppskotinum, og í nøkrum greinum er ordingin broytt.

Áseingar, sum ikki eru tiknar við:

1) Í § 8, stk. 2 og stk. 3 skjýtur nevndin upp, at løgtingsmaður, sum starvast á skrivstovu hjá landsstýrismanni og tekur fyrisitingarligar avgerðir hansara vegna, ella er fyristøðumaður á stovni beinleiðis undir landsstýrinum, fer úr hesum starvi, meðan hann er løgtingsmaður. Landsstýrið skilir væl hugsanina hjá nevndini, men heldur ikki, at tað er rætt í eini stýrisskipanarlóg at treyta valbæri hjá einum borgara av, at hann leggur frá sær sítt borgarliga starv. Í hesum sambandi verður víst til grundlógarinnar § 30, stk. 2.

2) Í § 15, stk. 3 skjýtur nevndin upp, at ein ávísur minniluti av løgtingsmonnum skal kunna krevja, at triðja viðgerð av einum lógaruppskoti ikki fer fram, fyrr enn 12 yrkadagar eftir at uppskotið er samtykt við aðru viðgerð. Landsstýrið heldur ikki eina tílíka reglu vera hepna, tí hon kann hava við sær óneyðuga seinkan av lógararbeiðinum.

3) Í § 16 skjýtur nevndin upp, at ein ávísur minniluti kann krevja eitt endaliga samtykt lógaruppskot roynt við fólkaatkvøðu, áðrenn tað verður staðfest. Landsstýrið ivast í, um ein tílík fyriskipan er heppin.

4) Í § 33, stk. 1 skjýtur nevndin upp, at løgtingsmaður, sum verður løgmaður ella landsstýrismaður, skal siga frá sær løgtingssessin, meðan hann situr í landsstýrinum. Vanligt er, at løgtingsmaður, sum verður løgmaður ella landsstýrismaður sjálvkravdur leggur tingsessin niður. Landsstýrið heldur, at rættast er, at núverandi skipan, har tann valdi sjálvur ger av, um hann sigur tingsessin frá sær, heldur fram.

5) Í § 34, stk. 3 og 4 skjýtur nevndin upp, at landsstýrið kann gera avtalu við ríkismyndugleikarnar, at hesir fyrisita málum, har fyrisitingin annars eigur at vera hjá landsstýrinum og undir hvørjum treytum, hetta kann verða gjørt. Landsstýrið heldur, at gongdin eigur at vera, at fleiri og fleiri álvarsmál eiga at verða løgd til heimastýrið. Ein heimild til at ganga øvugta vegin eigur ikki at vera.

6) Í § 47, stk. 2 skjýtur nevndin upp, at løgtingið í sambandi við samtykt um at seta ríkislóg í gildi eisini skal kunna samtykkja, at tað ikki er neyðugt at leggja lógarbroytingar á hesum øki fyri heimastýrið, áðrenn tær verða settar í gildi her. Landsstýrið heldur, at í øllum førum eigur at verða gingið eftir mannagongdini higartil soleiðis, at allar tílíkar lógir, eisini lógarbroytingar verða lagdar fyri heimastýrið, áðrenn tær verða settar í gildi.

Viðmerkingar til einstøku greinirnar í lógaruppskotinum:

Har landsstýrið ikki hevur serstakar viðmerkingar, verður víst til nevndarálitið. Landsstýrið hevur hesar viðmerkingar:

Ad § 4. Landsstýrið heldur, at innihaldið í galdandi stýrisskipanarlóg § 12, stk. 2 fyri valbæri eigur at verða varðveitt, soleiðis at revsiverd gerð bert førir við sær, at valbærið er mist í førum, har álvarsligt revsað brotsverk er framt.

Ad § 8. Landsstýrið hevur strikað seinasta punktum í § 8 sum verandi óneyðugt, tá tað er sjálvsagt at § 8 eisini fevnir um borgaralig umboð (ley støry ein eftir lóggávumi er skyldugur

at taka á seg) vegna tess at stýrisskipanarlóg Føroya er lóg, sum hevur gildi fram um alla aðrar løgtingslógir.

Ad § 10. Landsstýrið tekur undir við ásetingini í § 10, eisini við at løgtingið altíð verður sett ólavsøkudag og at tingformaðurin skipar fyri skrúðgongu, men heldur landsstýrið tað ikki vera rætt, at raðfylgjan í skrúðgonguni skal siga, hvørji tign skrúðgonguluttakararnir hava, tí slíkt samsvarar ikki við føroyskan hugsunnarhátt.

Ad § 12. Landsstýrið heldur, at rættast er, at løgmansrøðan kemur til umrøðu beinanvegin, so betri samanhang verður millum framløgu og viðgerð.

Aftaná § 15 verða øll greinanummrini flutt aftur í mun til uppskot nevndarinnar, við tað at § 16 í uppskoti nevndarinnar ikki er við í uppskoti landsstýrisins.

§ 16 (nevndarinnar § 17)
§ 17 (nevndarinnar § 18)
§ 18 (nevndarinnar § 19)
§ 19 (nevndarinnar § 20)
§ 20 (nevndarinnar § 21)
§ 21 (nevndarinnar § 22)
§ 22 (nevndarinnar § 23)
§ 23 (nevndarinnar § 24)
§ 24 (nevndarinnar § 25)
§ 25 (nevndarinnar § 26)

Ad § 26 (nevndarinnar § 27)
Her kann verða lagt aftrat viðmerkingum nevndarinnar, at løgmaður við staðfestingini er tann, sum rættarliga stendur til svars fyri, at løgtingslógin, sum staðfest verður, er samsvarandi grundlógini, heimastýrislógini og stýrisskipanarlógini, meðan løgtingsmenn standa veljaranum til svars fyri gerðir sínar.

§ 27 (nevndarinnar § 28)

Ad § 28 (nevndarinnar § 29)
Í grundregluni er landsstýrisins uppskot samsvarandi uppskoti nevndarinnar. Frestirnar fyri framløgu løgtingsformansins av uppskoti til løgmann eru bert broyttar solciðis, at frestin er hin sama, sum skotið upp av nevndini hvat viðvíkir fyrsta umfari, men munandi stytt um ikki løgtingsformansins uppskot á fyrsta sinni verður samtykt, tá ið sjónarmiðini hjá flokkunum mugu standa nógv greiðari hjá øllum í einum seinni samráðingarumfari.

Harumframt heldur landsstýrið, at frestin eisini eigur at ganga leygardagur, tá ið leygardagur er at rokna sum vanligur arbeiðsdagur hjá tingmonnum.

Í stk. 5 (nevndarinnar stk. 4) hevur landsstýrt gjørt tað greiðari, at skyldan at skriva út nýval um løgtingsformansins uppskot fjórðu ferð er fallið liggur á løgmanni.

§ 29 (nevndarinnar § 30)

§ 30 (nevndarinnar § 31)
§ 31 (nevndarinnar § 32)
§ 32 (nevndarinnar § 33)

Ad § 33 (nevndarinnar § 34)
Hóast landsstýrisskipanin við hesi lóg verður broytt til ráðharraskipan, har hvør landsstýrismaður situr fyri sínum málsøkjum, er her ásett, at landsstýrisfundir skulu vera, og at øll uppskot, sum løgmaður og landsstýrismenninir leggja fyri løgtingið og fyri fíggjarnevndina, skulu fyri á landsstýrisfundi.
§ 34 (nevndarinnar § 35)
§ 35 (nevndarinnar § 36)

Ad § 36 (nevndarinnar § 37)
Landsstýrið heldur at heitið varaløgmaður eigur at verða lógarfest, og er greinin tí broytt samsvarandi hesum.

§ 37 (nevndarinnar § 38)
§ 38 (nevndarinnar § 39)
§ 39 (nevndarinnar § 40)
§ 40 (nevndarinnar § 41)

Ad § 41 (nevndarinnar § 42)
Landsstýrið hevur tikið reglurnar um skuldbinding kommunannna burtur úr hesi grein tá ið yvirskriftin fyri greinini er "fíggjarmál landsins" og at seinni partur er í lógaruppskotinum við heitinum "kommunur" í § 55 (nevndarinnar § 56), sum umrøður viðurskifti kommunurnar. - Landsstýrið mætir til, at reglurnar verða fluttar til hesa grein.

§ 42 (nevndarinnar § 43)

Ad § 43 (nevndarinnar § 44)
Landsstýrið hevur broytt orðing nevndarinnar um, at ein fíggjarnevndarlimir skal kunna nýta vetorætt í sambandi við umsókn um eykajáttan. Landsstýrið heldur, at nóg góð trygd er, um ásett verður, at meira enn helmingurin av fíggjarnevndini tekur undir við umsóknini.

§ 44 (nevndarinnar § 45)
§ 45 (nevndarinnar § 46)
§ 46 (nevndarinnar § 47)
§ 47 (nevndarinnar § 48)
§ 48 (nevndarinnar § 49)
§ 49 (nevndarinnar § 50)
§ 50 (nevndarinnar § 51)

Ad § 51 (nevndarinnar § 52)
Landsstýrið hevur broytt orðingina av stk. 3 tá ið tað ikki altíð ber til at hava øll tey uppskot til løgtingslógir og ríkislógartilmæli greið at leggja fyri løgtingið, áðrenn millumlandasáttmálin skal háveldisstaðfestast (ratifiserast). - Landsstýrið heldur tó, at boðað eigur at verða frá, hvør lóggáva er neyðug, samstundis sum millumlandasáttmálin verður lagdur løgtinginum til góðkenningar.

§ 52 (nevndarinnar § 53)

Ad § 53 (nevndarinnar § 54)
Landsstýrið hevur brotyt orðingina í stk. 1 í greinini til ta somu sum í stk. 2. Vandi kann annars vera fyri, at landsstýrið verður steðgað í at taka avgerð í málum, sum hava bráðskund. Sjálvsagt eru eisini slíkar avtalur treytaðar av undirtøku løgtingsins.

§ 54 (nevndarinnar § 55)

Ad § 55 (nevndarinnar § 56)
Til hesa grein hevur landsstýrið flutt ein part av uppskoti nevndarinnar til § 42.

§ 56 (nevndarinnar § 57)
§ 57 (nevndarinnar § 58).

1. viðgerð 6. apríl 1994. Málið varð beint í serliga nevnd at viðgera mál nr. 190/1993: Løgtingslóg um stýrisskipan Føroya, sum 22. juni 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 24. mars 1994 og eftir 1. viðgerð tann 6. apríl 1994 beint í serliga løgtingsnevnd við umboðum fyri allar flokkar á tingi og uttanflokka tingmanninum Tordi J. Niclasen.

Í nevndini hava sitið fyri javnaðarflokkin Vilhelm Johannesen, fólkaflokkin Anfinn Kallsberg, sambandsflokkin Edmund Joensen, tjóðveldisflokkin Hergeir Nielsen, sjálvsstýrisflokkin Helena Dam á Neystabø, kristiliga fólkaflokkin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk Niels Pauli Danielsen og sum nevnt Tordur J. Niclasen.

Nevndin varð á tingfundi 19. mai 1994 víðkað við Lassa Klein, eftir at hann hevði boðað tinginum frá, at hann stóð uttanflokka. Lassi Klein hevur seinni tikið seg úr nevndini, eftir at hann er farin uppí kristiliga fólkaflokkin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk. Eisini skal verða nevnt, at Jógvan Sundstein hevur tikið sæti í nevndini fyri Anfinn Kallsberg.

Áðrenn støða varð tikin til, um málið skuldi beinast í eina víðkaða rættarnevnd, ella eina serliga løgtingsnevnd, heitti løgtingsformaðurin á floksformenninar á tingi, um at koma við einum tilmæli hesum viðvíkjandi. Floksformenninir mæltu til eina serliga nevnd har allir floksformenninir á tingi skuldi hava sæti í nevndini, og at størsti flokkur á tingi skuldi hava formannin.

Ætlanin var, at nevndin skuldi arbeiða sum millumtinganevnd við tí fyri eyga, at leggja álit fyri tingið í ólavsøkutingsetuni 1994. Nevndin skuldi fara til arbeiðis, tá ið tingsetan 1993 var endað, men av tí, at val varð útskrivað, helt henda ætlan ikki.

Á fundi millum løgtingsformannin og floksformenninar á tingi hin 19. mai 1994 varð niðurstøðan tann, at hóast val skal verða tann 7. juli 1994, so var tað rættast, at løgtingsmál

nr. 190/1993: Løgtingslóg um stýrisskipan Føroya varð avgreitt hesumegin valið. Nevndin hevur sostatt havt rættuliga avmarkaða tíð til at arbeiða í.

Mannagongdin fyri broyting av stýrisskipanarlógini er ásett í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum § 30, har ásett er, at fyri at uppskot til broyting av stýrisskipanarlógini skal fáa gildi, skal tað samtykkjast í tveimum umførum á løgtingi.

Fyrst skal uppskotið verða samtykt eftir triggjar viðgerðir á tingi. Hereftir hvílir málið, og verður eftir løgtingsval - **í fyrstu tingsetuni eftir valið** - at samtykkja **óbroytt** av nýggjum á løgtingi eftir triggjar viðgerðir. Tá verður soleiðis endaliga samtykta lógaruppskotið staðfest av løgmanni og meðundirskrivað av landsstýrismanni og kunngjørt, og hevur tá lógagildi.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin hildið fund við serligu nevndini, ið landsstýrið setti 1. apríl 1993 at kanna stýrisskipanarviðurskifti Føroya (stýrisskipanarnevndin). Nevndin hevur eisini hildið fund við løgmann, landsstýrismenn og stjóran á lógadeildini í landsstýrinum.

Undir viðgerðini hevur nevndin gjøgnumgingið lógaruppskotið grein fyri grein og samanhildið uppskot landsstýrisins við uppskotið frá stýrisskipanarnevndini. Nevndin hevur somuleiðis gjøgnumgingið viðmerkingarnar til tær einstøku greinirnar í uppskoti landsstýrisins og samanhildið hesar við viðmerkingarnar í álitinum frá stýrisskipanarnevndini.

Nevndin hevur staðfest, at størstu broytingarnar hjá landsstýrinum í mun til uppskotið hjá stýrisskipanarnevndini eru, at landsstýrið ikki tekur undir við uppskotinum hjá stýrisskipanarnevndini um, at ein triðingur av tingmanningini kann krevja eina 3. viðgerð útsetta í 12 dagar, og at ein triðingur av tingmanningini somuleiðis kann krevja fólkaatkvøðu um ávís løgtingsmál.

Undir viðgerðini í nevndini hava hesir spurningar fingið drúgvar og gjøllígar umrøður. Spurningarnir eru somuleiðis viðgjørdir á fundi við stýrisskipanarnevndina, og á fundi við løgmann og landsstýrið. Nevndin sum so tekur ikki undir við uppskotinum hjá stýrisskipanarnevndini. Tó hevur partur av nevndini serstøðu í hesum spurningi og kemur hesin við sínum egna broytingaruppskoti.

Nevndin viðmerkir til § 2, at meira hóskandi er, at mestatalið er eitt ólíkað tal, og metir at mestatalið eigur at verða 33 tingmenn ístaðin fyri 32. Sum er heldur nevndin, at 5 eykamenn afturat teimum 27 umdømisvaldu gevur eitt ov ójavnt býti, og at tað tí eigur at verða møguleika at hækka tingmannatalið við einum upp til 33. Nevndin viðmerkir tó, at 33 er mestatalið og einki er til hindurs fyri at gera eina skipan í løgtingsvallógini, har talið av umdømisvaldum verður sett niður, og eykamansvalið eisini sett niður samsvarandi hesum. Tordur J. Niclasen tekur ikki undir við hesum.

Í spurninginum um valbæri eru stýrisskipanarnevndin og landsstýrið ikki á einum máli. Stýrisskipanarnevndin mælir til, at løgtingið sjálvt tekur støðu í hvørjum einstøkum føri, tá talan er um, at løgtingsmaður er revsaður. Í sínum uppskoti endurtekur landsstýrið galdandi reglur (stýrisskipanarlógin § 12 stk. 2), sum eru, at løgtingsmaður kann ikki missa valbæri uttan so, at hann fær treytaleysan fongsulsdóm í 4 mánaðir ella longri. Ein meiriluti í nevndini tekur undir við hesum seinna, tó at orðið treytaleysan verður strikað, tá ið

spurningurin um dómur er treytaður eitt ikki aloftast ikki verður gjørdar av úttrá, hvussu álvarsligt brotsverkið er, men heldur eftir teim persónligu umstøðunum hjá tí dømda. Nevndin hevur umrøtt, um § 2 stk. 2 2. pkt. í løgtingsvallógini (sbr. uppskoti landsstýrisins § 57 stk. 2 d) skal standa við tá rættarstøðan á hesum øki verður óbroytt. Nevndin heldur, at henda avtøka eigur at standa við, nú hetta er ásett í stýrisskipanarlógini.

Hergeir Nielsen tekur tó ikki undir við uppskoti landsstýrisins, men mælir til, at uppskotið hjá stýrisskipanarnevndini um, at løgtingið sjálvt tekur støðu í hvørjum einstøkum føri, tá talan er um, at løgtingsmaður er revsaður, verður samtykt. Út frá hesi serstøðu setur Hergeir Nielsen fram broytingaruppskot.

Í sambandi við § 6 í uppskoti landsstýrisins hevur nevndin gjølliga umrøtt spurningin um, antin løgtingið skal sita í fýra ár, ella um møguleiki fyri nývali í ótíð skal verða til staðar. Bæði stýrisskipanarnevndin og landsstýrið mæla til, at møguleikin fyri vali í ótíð skal verða. Og hetta hevur nevndin tikið til eftirtektar.

Í § 8 í uppskoti landsstýrisins verður sagt, at valdur løgtingsmaður skal leggja frá sær øll álitisstørv í ráðum, nevndum o.l., sum eru undir eftirliti landsstýrisins tó undantikið sessur í oý- og bygdar(r)áð. Nevndin heldur, at undantaksreglan eigur at fevna um allar sessir, har talan er um fólkavald umboð, t.d. skúlanevndir, kirkjuráð o.s.fr. Nevndin setur fram broytingaruppskot samsvarandi hesum.

Stýrisskipanarnevndin hevur í áliti sínum skotið upp (§ 33 stk 1. og 2.), at løgmaður og landsstýrismenn, sum eru valdir løgtingsmenn skulu leggja frá sær løgtingssessin, meðan teir sita í landsstýrinum. Hesa áseting hevur landsstýrið ikki við í sínum uppskoti, men undir viðgerðini í nevndini er komið fram, at nevndin sum heild tekur undir við uppskotinum hjá stýrisskipanarnevndini hesum viðvíkjandi. Nevndin setur tí fram broytingaruppskot samsvarandi hesum.

Sambært hæði uppskotinum hjá stýrisskipanarnevndini og uppskotinum hjá landsstýrinum verður løgtingsformaður valdur fyri alt valskeiðið. Undir viðgerðini hevur nevndin verið sera ivasom í spurninginum um, hvørt ikki skal bera til at seta frá løgtingsformannin í valskeiðinum. Nevndin heldur, at møguleikin fyri nývali av formansskapi eigur at verða og skjýtur tí upp, at § 9 verður broytt solciðis, at nýval kann fara fram um 4/5 av tingmanningini skriviliga krevja hetta.

Undir viðgerðini hevur nevndin gjørt sær greitt, at nýggja stýrisskipanarlógin krevur umfatandi broytingar í tingskipanini og í fleiri løgtingslógum. Hetta hevur gjørt, at nevndin er vorðin ivasom um, antin stýrisskipanarlógin kann koma í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, ella ikki. Nevndin mælir tí til, at lógin fær gildi ólavsøkudag 1995.

Somuleiðis er nevndin vorðin greið yvir, at nýggja skipanin við ráðharrastýri sambært uppskotinum krevur umfatandi fyrireikingar, og tí heldur nevndin, at hesin parturin av stýrisskipanarlógini eigur at koma í gildi seinni enn lógin annars. Skotið verður upp, at hesin parturin kemur í gildi ólavsøkudag 1996.

Nevndin hevur givið spurninginum um minnilutaverjureglurnar eina sera nágreinuliga viðgerð. Spurningurin er, hvussu stóran part av tingmanningini hesar reglur skulu fevna um.

Stýrisskipanarnevndin og landsstýrið mæta til 1/3 (11 tingmenn). Nevndin heldur, at 2/5 (13 tingmenn) er meira hóskandi og setur fram broytingaruppskot samsvarandi hesum.

Undir viðgerðini av uppskotinum hevur nevndin umrøtt løgtingsumboðsmannsstovn. Tingssamtykt er sum kunnugt gjørd hesum viðvíkjandi í løgtingsmáli nr. 197/1992, og peningur er settur av á verandi fíggjarlóg (§ 10/10177) til tílíkan stovn. Nevndin heldur tí at rættast er, at tað í stýrisskipanarlógini verður veitt heimild til stovnseting av løgtingsumboðsmanni. Nevndini er tó greitt, at skal stovnurin virka eftir ætlan, mugu heimildir og støv stovnsins gjølliga verða umhugsað, áðrenn lógaruppskot stovninum viðvíkjandi verður samtykt.

Sum nevnt hevur nevndin ásannað, at nýggja stýrisskipanarlógin krevur umfatandi broytingar í tingskipanini og í fleiri løgtingslógum. Nevndin setur tí fram tvey uppskot til samtyktar. Í fyrra uppskotinum verður mælt til, at seta nevnd við verandi og fyrrverandi løgtingsformonnum at endurskoða tingskipanina. Í seinna uppskotinum verður álagt landsstýrinum, at leggja uppskot fyri løgtingið um broytingar í ymiskum løgtingslógum.

Nevndin heldur, at hjá nevndini, ið verður sett at endurskoða tingskipanina, eigur at bera til at taka sær serkøna hjálp og mælt verður tí til, at landsstýrið og løgtingsins fíggjarnevnd útvega neyðugan pening til endamálið.

Spurningurin, hvørt tað er neyðugt at hava eina reglu í stýrisskipanarlógini svarandi til grundlógarinnar § 20 viðvíkjandi luttøku í millumtjóða felagsskapum, sum taka við heimildum heimastýrisins, á tann hátt, at felagsskapurin á ávísum málsøkjum fær beinleiðis vald mótvegis føroyska borgaranum, hevur fingið drúgva umrøðu í nevndini.

Nevndin er vorðin samd um, at skal luttakast í slíkum millumtjóða felagsskapum, so er neyðugt at fremja broytingar í heimastýrislógini. Hetta kemst av, at heimildin fyri stýrisskipanarlógini er heimastýrislógin.

Harumframt er neyðugt við broytingum í stýrisskipanarlógini.

Vanliga mannagongdin, tá ið stýrisskipanarlógin skal broytast, er áseti í lógaruppskotinum § 56 stk 1, sum endutekur galdandi rættarstøðu.

Mannagongdin, tá ið heimastýrislógin skal broytast, er umrødd í álitinum hjá stýrisskipanarnevndini bls. 69 ff.

Sambært álitinum hjá stýrisskipanarnevndini er neyðugt við
- samtykt á løgtingi og staðfesting løgmans
- samtykt á fólkatingi og staðfesting drottningar

Hvørki eftir grundlógini ella heimastýrislógini krevst formliga fólkaatkvøða í Føroyum fyri at broyta heimastýrislógina. Nevndin heldur tó, at eftir óskrivaðum reglum krevst eisini játtan fyri slíkari broyting við fólkaatkvøðu í Føroyum.

Tá ið so er, at heimastýrislógarbroyting krevur fólkaatkvøðusamtykt í Føroyum, er eingin andsøgn í at hava eitt grein sum landsstýrið mælir til í § 56 stk. 2, har sagt verður, at um

so er, at heimastýrislógin verður broytt, ber til at gera broytingar orsakað av hesum í stýrisskipanarlógini við vanligari løgtingslóg. Broytingin er tá longu frammanundan gjørd av sum heimastýrislógarbroytung í Føroyum og Danmark við staðfesting á fólkaatkvøðu í Føroyum.

Samsvarandi tí, ið frammanfyri er ført fram, mælir **ein meiriluti** (Vilhelm Johannesen, Jógvan Sundstein, Hergeir Nielsen, Helena Dam á Neystabø, Niels Pauli Danielsen og Tordur J. Niclasen (tó ikki viðv. § 2)) til

at samtykkja

uppskot landsstýrisins við hesum broytingum:

1) § 2 verður orðað soleiðis:
"Løgtingið er ting við í mesta lagi 33 tingmonnum"

2) § 4 stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Stk. 2. Tann, ið dømdur er fyri revsiverda gerð, verður ikki óverdugur til tingsess, uttan so, at hann fær fongsulsdóm í 4 mánaðir ella longri, ella tryggdarvarðhaldsdóm."

3) § 8 verður orðað soleiðis:
"§ 8. Tá ið góðkent er, at løgtingsmaður er valdur, skal hann leggja frá sær øll álitisstørv í nevndum, ráðum o.t., sum eru undir eftirliti landsstýrisins ella, sum landsstýrið hevur skipað hann í, tó undantikin beinleiðis fólkavald umboð."

4) § 9 verður orðað soleiðis:
"§ 9. Nývalda løgtingið kemur saman til fundar kl. 10.00 tólvta yrkadag eftir valdagin, uttan so er, at løgmaður ikki longu hevur boðað til fundar.
Stk. 2. Tá ið valbrøvini eru góðkend, verður løgtingið sett, og valdir verða løgtingsformaður og næstformenn.
Stk. 3. Løgtingsformaður og næstformenn sita alt valskeiðið uttan so er, at teir sjálvbodnir leggja frá sær ella fýra fimtingar av øllum tingmonnum skrivliga krevja nýval av formanskapi."

1) § 2 affattes således:
"Lagtinget udgør een forsamling bestående af højst 33 medlemmer"

2) § 4 stk. 2 affattes således:
"Stk. 2. Den, der er dømt for en strafbar handling, er ikke uværdig til lagtingsmandat, med mindre domfældte er idømt straf af fængsel i 4 måneder eller derover eller forvaring."

3) § 8 affattes således:
"§ 8. Når valget af et lagtingsmedlem er godkendt, skal medlemmet nedlægge alle hverv i nævn, råd o.l., som er under tilsyn af landsstyret eller, hvor medlemmet er beskikket til hvervet af landsstyret, dog med undtagelse af direkte folkevalgte repræsentanter."

4) § 9 affattes således:
" § 9. Det nyvalgte lagting træder sammen kl. 10.00 den tolvte søgnedag efter valgdagen, dersom lagmanden ikke har indkaldt det til møde forinden.
Stk. 2. Straks efter prøvelsen af mandaterne sættes lagtinget ved valg af lagtingsformand og næstformænd.
Stk. 3. Lagtingsformanden og næstformændene er valgt for hele valgperioden medmindre de nedlægger deres hverv eller fire femtedele af alle lagtingsmedlemmerne skriftlig kræver nyvalg af formandsskabet."

5) § 10 stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Stk. 2. Ólavsøkudag ganga løgtingsformaður, løgtingsmenn, løgmaður, landsstýrismenn og embætismenn skrúðgongu úr tinginum í dómkirkjuna, har gudstænasta verður hildin, og síðan aftur í tingið. Løgtingsformaðurin ger av, hvørjir embætismenn eru við í skrúðgonguni, og hvussu gongan er skipað."

5) § 10 stk. 2 affattes således:
" Stk. 2. Olajdag går lagtingsformanden, lagtingsmænd, lagmanden, medlemmer af landsstyret og embedsmænd i procession fra lagtinget til og fra domkirken, hvor der afholdes gudstjeneste. Lagtingsformanden fastsætter, hvilke embedsmænd der deltager i processionen, og i hvilken orden, der bliver gået."

6) § 21 stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Stk. 2. Sama rætt hevur løgtingsmaður, um tveir fimtingar av tingmonnum á fundi tekur undir."

6) § 21 stk. 2 affattes således:
"Stk. 2. Samme ret har lagtingsmedlem såfremt to femtedele af de fremmødte lagtingsmedlemmer billiger dette."

7) § 32 verður orðað soleiðis:
"§ 32. Løgtingsmaður, sum verður løgmaður ella landsstýrismaður, sigur frá sær løgtingssessin, meðan hann situr í landsstýrinum.
Stk. 2. Nærri reglur um setingarviðurskifti løgmans og landsstýrismanna verða ásettar í løgtingslóg."

7) § 32 affattes således:
"§ 32. Et lagtingsmedlem, der udnævnes til lagmand eller landstyresmedlem, udtræder af lagtinget, medens vedkommende er medlem af landsstyret.
Stk. 2. De nærmere regler om lagmanden og landsstyresmedlemmernes ansættelsesforhold fastsættes ved lagtingslov."

8) § 38 stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Stk. 2. Hevur nevndin illgruna um, at óregluliga hevur verið athorið, kann hon krevja, at løgtingsformaðurin setur eina kanningarstjóra, sum ikki hevur dómsmyndugleika. Hann skal, eftir at hann hevur kannað málið, gera eina frágreiðing til løgtingið, hvørt fyrisitingin í ávísum máli er útint á lógligan hátt. Tveir fimtingar av løgtingsmonnunum kunnu skrivliga seta fram sama krav."

8) § 38 stk. 2 affattes således:
"Stk. 2. Såfremt udvalget får mistanke om, at uregelmæssigheder har fundet sted, kan det kræve, at lagtingsformanden udpeger en undersøgelsesleder. Den pågældende, der ikke har dømmende myndighed, skal efter stedfunden undersøgelse udarbejde en redegørelse til lagtinget, om administrationen af en konkret sag har været foretaget på lovlig vis. To femtedele af lagtingets medlemmer kan skriftligt fremsætte samme krav."

9) Sum nýggj § 39 verður sett:
"§ 39. Í løgtingslóg kann verða ásett, at løgtingið velur uttantingsmann, at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins"

§ 39 og allar § seinni í uppskoti landsstýrisins fáa hereftir eitt nr. hægri. Sama er fyri ávísingar til somu § nr. (Um samtykt verður at seta inn nýggja § 16 millum § 15 og § 16, tá tvey nr.)

9) Som ny § 39 indsættes:
"§ 39. Ved lagtingslov kan bestemmes, at lagtinget vælger en person, der ikke er medlem af lagtinget, til at have indseende med hjemmestyrets forvaltning"

§ 39 og alle § nr. herefter i landsstyrets forslag får herefter et nr. højere. Det samme gælder henvisninger til samme § nr. (Såfremt vedtages at indsætte ny § 16

10) § 42 stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Stk. 2. Eingin útreiðsla má verða goldin, uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg, ella aðrari játtanarlóg, ið er í gildi, tá ið ávíst verður. Tó kann í tíðarskeiðinum fram til 1. apríl, eftir at fíggjarárið er endað, verða ávístur peningur av farnu fíggjarlóginí fyri útreiðslur, ið havuar eru í farna fíggjarári."

11) § 43 stk. 2 verður orðað soleiðis:
" Stk. 2. Um mál hevur skund, kann løgtingsins fíggjarnevnd eftir uppskoti frá landsstýrinum veita eykajáttan, utran so er, at tveir fimtingar av nevndarlimunum krevja málið avgjørt við løgtingslóg."

12) Stk. 3 í § 43 verður orðað soleiðis:
"Stk. 3 Eykajáttanir, sum fíggjarnevndin hevur veitt fígjøgnum árið, verða at góðkenna við eykafíggjarlóg í seinasta lagi 31. desember sama ár. Landsstýrið hevur skyldu at leggja fram uppskot hesum viðvíkjandi innan 1. desember."

13) § 48 stk. 2 verður strikað.

14) § 53 stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Stk. 1. Løgtingið velur millum løgtingsmenn eina uttanlandsnevnd við sjey limum, sum landsstýrið ráðfórir seg við, áðrenn avgerðir verða tiknar, ið hava stóran uttanlandspolitiskan týdning."

15) Í § 55 verður orðið "millumkommufelagsskapir" broytt til "millumkommunufelagsskapir"

16) § 57 stk. 1. verður orðað soleiðis:
"Løgtingslógin fær gildi ólavsøkudag 1995."

17) Sum nýggj § 57 stk. 3 verður sett:
"Stk. 3. § 33 í hesi løgtingslóg fær tó ikki gildi fyrr enn Ólavsøkudag 1996. Til

imellem § 15 og § 16, så to nr.)

10) § 42 stk. 2 affattes således:
" Stk. 2. Ingen udgift må afholdes, som ikke har hjemmel i den pa anvisningstiden gældende finanslov eller i anden bevillingslov. Dog kan i tidsrummet frem til 1. april efter finansårets udløb, anvises udgifter, afholdt i sidste finansår, som måtte være bevilgede på finansloven for det forløbne år."

11) § 43 stk. 2 affattes således:
" Stk. 2. Såfremt en sag er af hastende karakter, kan lagtingets finansudvalg efter forslag fra landsstyret yde en tillægsbevilling, menmindre to femtedele af medlemmerne kræver sagen afgjort ved lagtingslov."

12) Stk. 3 i § 43 affattes således:
"Stk. 3. Tillægsbevillinger, som finansudvalget yder i løbet af året skal godkendes i en tillægsbevillingslov senest 31. december samme år. Landsstyret er pligtigt til at fremsætte forslag herom inden 1. december."

13) § 48 stk. 2 udgår.

14) § 53 stk. 1 affattes således:
" Stk. 1. Lagtinget vælger af sin midte et udenlandsnævn på syv medlemmer, med hvilket landsstyret rådfører sig forud for enhver beslutning af større udenlandspolitisk rækkevidde."

16) § 57 stk. 1 affattes således:
"Lagtingsloven træder i kraft olaidag 1995."

17) Som ny § 57 stk. 3 indsættes:
"Stk. 3. § 33 i denne lagtingslov træder dog ikke i kraft førend olaidag 1996.

henda § fær gildi hava § 6 í løgtingslóg nr. 1 frá 13.05.1948 um stýriskipan Føroya í sermálum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 2 frá 03.01.1985 og § 8 í løgtingslóg nr. 2 frá 13.05.1948 um umboðsvald Føroya framvegis gildi."

Indtil denne § træder i kraft bevarer § 6 i lagtingslov nr. 1 af 13.05.1948 om Færøernes styrelsesordning i særanliggender, som senest ændret ved lagtingslov nr. 2 af 03.01.1985 og § 8 i lagtingslov nr. 2 af 13.05.1948 om Færøernes forvaltning deres gyldighed."

Sami meiriluti setur eisini fram soljóðandi:

II Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið setur nevnd við formanninum í tinginum, valdum 7. juli 1994 og fyrrverandi formonnum løgtingsins Lassa Klein, Anfinn Kallsberg, Jacob Lindenskov, Hergeir Nielsen, Jógvan Sundstein, Agnar Nielsen og Hilmar Bech, at gera uppskot til broyting av tingskipan løgtingsins solciðis, at tingskipanin m.a. samsvarar tí av løgtinginum í juni 1994 í fyrsta umfari samtykta uppskoti til løgtingslóg um stýrisskipan Føroya. Álitið verður at leggja fyri løgtingið samstundis, sum uppskotið um nýggja stýrisskipan kemur til viðgerðar á øðrum sinni.

III Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at leggja fyri løgtingið innan 1. januar 1995:

- **Uppskot til løgtingslóg, sum tekur av allar fyrisitingarligar heimildir hjá løgtingsnevndum og leggur tær til landsstýrið,**

- **uppskot til løgtingslóg, og uppskot til tilmæli til ríkismyndugleikarnir til ríkislóg, sum leggur allar heimildir løgtingsins at velja limir í nevndir, stýri og ráð til landsstýrið,**

- **uppskot til løgtingslóg og uppskot til tilmæli til ríkismyndugleikarnir til ríkislóg, sum tekur av fyrisitingarligan myndugleika hjá nevndum, stýrum og ráðum og leggur hann til landsstýrið í teim førum, tá ið nevndin, stýrið ella ráðið ikki**

umboðar serligan yrkiskunnleika ella serlig áhugamál, men bert vanlig politisk áhugamál,

- uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ábyrgd landsstýrismanna soleiðis, at hon verður lagað til samtykta stýrisskipanarlógaruppskotið.

Niels Pauli Danielsen vísir á, at málið hevur fingið politiska viðgerð í nevnd, sum hevði sín fyrsta fund hósdagin hin 2. juni 1994, 13 dagar aftaná, at løgmaður hevði ásett løgtingsval at verða hin 7. juli 1994.

Tað ber illa til at geva einum so stórum og týdningarmiklum máli sum løgtingslóg um stýrisskipan Føroya ta neyðugu politisku viðgerð, samstundis sum politikararnir hava nógv um at vera við fyrireikingum til val og við at føra valstríð.

Tí hevur tað verið høvuðsáskoðan minnilutans, at nýggja løgtingið eigur at sleppa at viðgera lógaruppskotið uttan at kenna seg bundið av nakrari í skundi gjørdari samtykt hjá løgtinginum, ið nú leggur frá sær.

Tá ið vit hava livað undir teimum gomlu lógunum so leingi sum síðani 1948, man tað bera til at gera tað ta tíð afturat, sum krevst til eina gjølliga viðgerð av nýggju stýrisskipanarlógini.

Harumframt er eingin til fulnar førur fyri at siga, hvussu nógv ið uppskotið hjá nevndini kemur at føra við sær av útreiðslum fyri landskassan bæði til umsiting og broytingar av lógar- og kunngerðartekstum.

Nógv vald verður við uppskotinum hjá nevndini lagt til landsfyrisitingina og tann einstaka landsstýrismannin, og hevur minnilutin undir nevndarviðgerðini víst á ta skipan, ið er galdandi í øðrum londum og alt meira verður nýtt í næstu grannalondum okkara við nøkrum embætismonnum, ið koma og fara saman við teimum ymisku politikarunum, ið sita fyri ráðharrastovunum.

Hetta vil styrkja politikaran mótvegis tí fasta embætisvaldinum, tryggja politiska viljan og vera við til at fyribyrgja misnýtslu.

Tordur J. Niclasen fegnast yvir, at nú tykist at vera komið á mál við nýggjari stýrisskipannarlóg fyri Føroyar. Hetta er eisini fult í tráð við tað uppskot, sum Tordur J. Niclasen í mars mánað 1993 legði fyri tingið, har álagt varð landsstýrinum at gera broytingar í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya í sermálum og sum skjótast at leggja málið fyri tingið.

Í viðmerkingunum til uppskotið varð m.a. sagt: "Tey seinnu árini í politisku søgu landsins hava verið merkt av rembingum, skuldsetingum um heimildarloysi landsstýrismanna og hevur ein gøla fyri og onnur eftir merkt orðaskiftið".

Sambært løgtingslóg um stýrisskipan Føroya í sermálum, er tað landsstýrið, sum stendur til svars fyri fyrisitingini av sermálum. Her er talan um eina kollegiala ábyrgd.

Trupulleikin við føroysku stýrisskipanini er sostatt tann, at tað als ikki ber til at plasera ábyrgd hjá landsstýrismonnum.

Henda "ábyrgdarleysa" skipan hevur ikki gagnað fyrisitingini ella politiska umdømi Føroya - hvørki heima ella uttanlands.

Vit áttu tí sum skjótast at gingið burtur frá hesi kollegialu skipan, har allir (ella eingin) hevur ábyrgd at tí, ein fremur, og heldur fingið eina sokallaða ráðharraskipan, har einstaki landsstýrismaðurin einsamallur hevur ábyrgd av sínum málsøki.

Ein annar vansi í okkara skipan er samanblandingin av útinnandi og lóggevandi valdinum. Her verður hugsað um, hvussu tær stóru nevndirnar - eina mest fíggjar- og fiskivinnunevndin eru við í beinleiðis fyrisitingini av samfelagnum. Tað átti at kunna latið seg gjørt, at fyrisitingarvaldið - landsstýrið - umsat eftir lógum og reglum, uttan at tær ymisku nevndirnar beinleiðis løgdu seg út í fyrisitingina.

Broytingin á hesum øki hevði somuleiðis gjørt tað lættari at plasera ábygdina.

Lond við fólkaræðisligari stýrisskipan hava skipað almenna valdið í triggjar sínámillum óheftar partar: lóggevandi, útinnandi og dømandi valdið.

Slík skipan er ikki av tilvild, men fyri at tryggja borgaranum fólkaræðisligu rættindi.

Hvat eftirliti við útinnandi fyrisitingini viðvíkur, hevði tað tænt borgarans sak, at havt ein løgtingsumboðsmann.

Einki at ivast í, at ein ráðharraskipan, har greiður skilnaður var millum lóggevandi og fyrisitingarvaldið hevði gjørt, at skattgjaldarans peningur hevði verið fyrisitin við størri ábyrgd enn higartil.

Sum nakað nýtt í hesum uppskoti er fingin við heimildin at seta løgtingsumboðsmann.

Hetta metir undirritaði av avgjørdum týdningi fyri rættartrygdina í hesum samfelagi og ein styrki fyri borgarar landsins.

Eisini er komið við í fyriliggjandi uppskot, at eykafíggjarløgtingslóg skal verða framløgd í seinasta lagi 31. december í avvarðandi fíggjarári.

Hetta er at fegnast yvir - og fer at geva løgtingi eins væl og borgarum landsins eitt gjøllari dagført innlit í, hvussu skattgjaldarans peningur verður (hevur verið) fyrisitin í avvarðandi fíggjarári.

Nú er bert at vóna, at uppskotið um nýggja stýrisskipannarlóg fyri Føroyar verður samtykt - fyrst av sitandi løgtingi, síðani av komandi.

Hetta skylda vit skattgjaldaranum og hetta skylda vit okkum sum tjóð.

Ein minniluti (Edmund Joensen, Niels Pauli Danielsen og Tordur J. Niclasen) hevur so-

ljóðandi

IV. broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins:

1) § 15 stk. 3 verður soljóðandi:
"Stk. 3. Tveir fimtingar av løgtingsmonnum kunnu av formanninum krevja, at triðja viðgerð ikki fer fram, fyrr enn 12 yrkadagar eftir, at uppskotið er samtykt við aðru viðgerð. Áheitanin skal verða skrivlig og undirritað av teimum løgtingsmonnunum, ið taka undir. Viðgerð av uppskotum til fíggjarlógir, eykafíggjarlógir, bráðfeingis fíggjarlógir, lán- og borganarlógir, lógir um ognartøku, lógir um óbeinleiðis skatt kunnu ikki verða freistaðar. Heldur ikki kann, í átrokandi førum, viðgerðin av uppskotum til løgtingslógir og ríkislógartilmæli verða freistað, tí at gildisseting teirra kann ikki verða freistað av fyriliti fyri endamáli lógarinnar."
§ 15 stk. 3 verður § 15 stk. 4.

1) § 15 stk. 3 affattes således:
"Stk. 3. To femtedele af lagtingets medlemmer kan overfor formanden begære, at tredie behandling tidligst finder sted 12 søgnedage efter forslagets vedtagelse ved anden behandling. Begæringen skal være skriftlig og underskrevet af de deltagende lagtingsmedlemmer. Udsættelse kan dog ikke finde sted, forsåvidt angår forslag til finanslove, tillægsbevillingslove, midlertidige bevillingslove, låne- og kautionslove, love om ekspropriation, love om indirekte skatter samt i påtrængende tilfælde forslag til lagtingslove og forslag til beslutninger vedrørende rigslovgivning, hvis ikrafttræden ikke kan udsættes af hensyn til lovens formål."
§ 15 stk. 3 bliver herefter § 15 stk. 4.

2) Sum nýggj § 16 verður sett:
"§ 16. Tá ið løgtingslógaruppskot ella uppskot til ríkislógartilmæli er samtykt av løgtinginum, kunnu tveir fimtingar av løgtingsmonnunum innan eina frest upp á triggjar yrkadagar, frá tí at uppskotið er endaliga samtykt, biðja løgtingsformannin um fólkaatkvøðu um uppskotið. Áheitanin skal verða skrivlig og undirritað av løgtingsmonnunum, ið taka undir.
Stk. 2. Eitt løgtingslógaruppskot ella uppskot til ríkislógartilmæli, sum kann fara til fólkaatkvøðu, sbr. stk. 6, kann bert í tí føri, ið nevnt er í stk. 7, verða staðfest av løgmanni, innan frestin nevnd í stk. 1 er úti, ella áðrenn umbiðin fólkaatkvøða hevur verið.
Stk. 3. Tá ið fólkaatkvøða er umbiðin um eitt løgtingslógaruppskot ella ríkislógartilmæli, kann løgtingið innan eina frest upp á fimm yrkadagar frá tí at uppskotið er endaliga samtykt gera av, at uppskotið skal falla burtur.
Stk. 4. Tekur løgtingið ikki avgerð sbr.

2) Som ny § 16 indsættes:
"§ 16. Når et lagtingslovsforslag eller forslag til beslutning vedrørende rigslovgivning er vedtaget af lagtinget, kan to femtedele af lagtingets medlemmer inden for en frist af tre søgnedage fra forslagets endelige vedtagelse overfor formanden begære folkeafstemning om lovforslaget. Begæringen skal være skriftlig og underskrevet af de deltagende medlemmer.
Stk. 2. Et lagtingslovsforslag eller et forslag til beslutning vedrørende rigslovgivning, som kan undergives folkeafstemning, jfr. stk. 6, kan kun i det i stk. 7 omhandlede tilfælde stadfæstes af lagmanden inden udløbet af den i stk. 1 nævnte frist, eller inden begæret folkeafstemning har fundet sted.
Stk. 3. Når der er begæret folkeafstemning om et lagtingslovsforslag eller et forslag til beslutning vedrørende rigslovgivning, kan lagtinget inden for en frist af fem søgnedage fra forslagets endelige vedtagelse beslutte, at forslaget skal bortfalde.

stk. 3. skal fráboðan um, at uppskotið skal verða roynt við fólkaatkvøðu, skjótast gjørligt verða latin løgmanni, sum síðan letur uppskotið kunngera við fráboðan um, at fólkaatkvøða verður hildin. Fólkaatkvøða verður hildin eftir nærri reglum ásettum av løgmanni í fyrsta lagi tólv og í seinasta lagi átjan yrkadagar eftir kunngerðina.

Stk. 5. Á fólkaatkvøðuni verður atkvøtt fyri og ímóti uppskotinum. Til tess at uppskotið skal falla burtur, krevst, at meirilutin av løgtingsveljarunum, ið hava greitt atkvøðu, hevur atkvøtt ímóti uppskotinum.

Stk. 6. Uppskot til fíggjarlógir, eykafíggjarlógir, bráðfeingis fíggjarlógir, láns- og borganarlógir, lønar- og eftirlønarlógir, lógir um ognartøku, lógir um beinleiðis og óbeinleiðis skattir og lógir um útlaning av galdandi millumlanda sáttmálum kunnu ikki fara til fólkaatkvøðu.

Stk. 7. Í serliga átrokandi førum kann eitt uppskot til løgtingslóg ella ríkislógartilmæli, sum kann fara til fólkaatkvøðu, verða staðfest av løgmanni alt fyri eitt eftir samtykt, tá ið tað er ásett í uppskotinum. Um so er, at tveir fimtingar av løgtingsmonnunum eftir reglunum ásettum í stk. 1 krevur fólkaatkvøðu um uppskotið ella staðfestu løgtingslógina ella ríkislógartilmæli, verður hildin fólkaatkvøða eftir frammanfyri nevndu reglum. Fellur løgtingslógin ella ríkislógartilmælið á fólkaatkvøðuni, kunngjørdur tað uttan óneyðuga dvøl og í seinasta lagi fjúrtan dagar eftir fólkaatkvøðuna. Frá kunngerðardegnum er løgtingslógin burturfallin. Sama er við ríkislógartilmæli."

§ 16 og allar seinni greinir og ávísingar í uppskoti landsstýrisins til somu greinir fáa hereftir eitt nr. hægri.

Stk. 4. Træffer lagtinget ikke beslutning i henhold til stk. 3, skal meddelelse om, at lovforslaget skal prøves ved folkeafstemning, snarest tilstilles lagmanden, der derefter lader lovforslaget bekendtgøre med meddelelse om, at folkeafstemning vil finde sted. Folkeafstemningen iværksættes efter lagmandens nærmere bestemmelse tidligst tolv og senest atten søgnedage efter bekendtgørelsen.

Stk. 5. Ved folkeafstemningen stemmes for og mod lovforslaget. Til lovforslagets bortfald kræves, at et flertal af de i afstemningen deltagende lagtingsvælgere, har stemt mod lovforslaget.

Stk. 6. Forslag til finanslove, tillægsbevillingslove, midlertidige bevillingslove, låne- og kautionslove, lønnings- og pensionslove, love om ekspropriation, love om direkte og indirekte skatter og love om gennemførelse af bestående traktatmæssige forpligtelser kan ikke undergives folkeafstemning.

Stk. 7. I særdeles påtrængende tilfælde kan et lagtingslovsforslag eller forslag til beslutning vedrørende rigslovgivning, som kan undergives folkeafstemning, stadfæstes af lagmanden straks efter dets vedtagelse, når forslaget indeholder bestemmelse herom. Såfremt to femtedele af lagtingets medlemmer efter de i stk. 1 omhandlede regler begærer folkeafstemning om forslaget eller den stadfæstede lagtingslov eller beslutning vedrørende rigslovgivning, afholdes sådan folkeafstemning efter foranstående regler. Forkastes loven eller beslutningen vedrørende rigslovgivning ved folkeafstemningen, kundgøres dette af lagmanden uden unødigt ophold og senest fjorten dage efter folkeafstemningens afholdelse. Fra kundgørelsesdagen er loven eller beslutningen vedrørende rigslovgivning bortfaldet. "

§ 16 i landsstyrets forslag og alle senere § og henvisninger til samme får herefter et § nr. højere.

V. Ein minniluti (Tordur J. Niclasen) heldur at eitt mestatal við 27 tingmonnum er meira hóskandi sæð í mun til fólkatalið í Føroyum og setur tí fram soljóðandi broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins:

§ 2 verður orðað soleiðis: "Løgtingið er ting við í mesta lagi 27 tingmonnum."	§ 2 affattes således: "Lagtinget udgør een forsamling bestående af højst 27 medlemmer."

Ein minniluti (Hergeir Nielsen) hevur soljóðandi

VI broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins:

§ 4 verður orðað soleiðis: "§ 4. Valbærur er hvør, sum hevur valrætt til løgtingið, uttan so er, at hann er revsaður fyri gerð, sum hevur við sær, at hann eftir almannahugsan ikki er verdugur at sita á tingi."	§ 4 affattes således: "§ 4. Valgbar er enhver, som har valgret til lagtinget, medmindre vedkommende er straffet for en handling, der i almindeligt omdømme gør ham uværdig til at være medlem af lagtinget."

Ein minniluti (Edmund Joensen) heldur, at í uppskoti landsstýrisins er ov nógvur ivi viðvíkjandi teimum broytingum í stýrisskipanarlógini, sum skulu fremjast, um so er, at Føroyar søkja um limaskap í ES.

Í viðmerkingunum til § 1 á bls. 173 í álitinum hjá stýrisskipanarnevndini verður sagt:

> "Innihaldið í greinini ger endaliga valdsbýti upp í yvirtiknum málum, og førir hetta m.a. við sær, at lóggevandi, útinnandi og dømandi valdið ikki kann lata hetta vald frá sær sjálvt, heldur ikki við løgtingslóg. - Ein avleiðing av greinini er, at Føroyar ikki kunnu fara upp í ES, uttan at lógin verður broytt, við tað at ES tá fær ávísar heimildir, sum umrøddu stovnar hava í dag."

Útgangsstøðið er sostatt, at Føroyar ikki kunnu gerast limir í ES uttan so, at stýrisskipanarlógin verður broytt sambært verandi skipan. T.v.s. at broytingaruppskotið fyrst verður samtykt av einum sitandi løgtingsmeiriluta. Síðani skal val útskrivast, og ikki fyrr enn nývalda tingið samtykkir uppskotið enn eina ferð í óbroyttum líki, kann løgmaður endaliga staðfesta og kunngera lógina, sbr. § 56 stk. 1.

Hetta er ein sera stirvin og tung mannagongd og kann í ringasta føri bera í sær, at ein samtykt um møguligan limaskap í ES dregur út í væl meira enn eitt valskeið uppá 4 ár.

Eftir minnilutans áskoðan er hetta ein óhaldbar støða, tá flest onnur lond hava eina innbygda skipan har limaskapur í millumtjóða felagsskapi kann setast í verk við tingsamtykt og eftirfylgjandi góðkenning við fólkaatkvøðu.

Her kundi minnilutin hugsað sær, at ein regla sum er lík § 20 í donsku grundlógini, var skoytt uppí verandi uppskot, soleiðis at nevndu møguleikar vóru til staðar.

Hetta hevur ikki verið gjørligt orsakað av, at løgfrøðingar eru komnir til ta niðurstøðu, at ein evt. limaskapur í ES krevur broytingar í heimastýrislógini.

Soleiðis er ikki gjørligt at lóggeva í stýrisskipanarlógini um viðurskifti, sum eru ásett í hægri lóggávu, sum stýrisskipanarlógin sjálvsagt má virða.

Spurningurin er nú, um verandi løgtingslógaruppskot til nýggja stýrisskipanarlóg loysir upp fyri hesum trupulleikum.

Spurningurin snýr seg í hesum serstaka føri um tulkingina av § 56 stk. 2 í uppskoti landsstýrisins.

T.v.s. verður komið til ta niðurstøðu, at broytingar krevjast í heimastýrislógini til tess at gerast limur í ES, so er ongin trupulleiki, grundað á tann veruleika, at broytingar í stýrisskipanarlógini, tá kunnu verða framdar eftir vanligum reglum.

Verður úrslitið av eini tulking av hesum spurningi hinvegin, at tað ikki er tørvur á nøkrum broytingum í heimastýrislógini, so tella vit aftur á upprunaligu reglurnar, sum gera tað bæði torført og drúgført at fremja eina slíka broyting, við tað, at eitt valskeið tá skal vera runnið ímillum hvørja samtykt á Føroya Løgtingi.

Vegna tess, at tað ikki enn er fingin nøkur endalig vissa fyri, hvør tulking er tann rætta, skjýtur minniluttin upp, at loyst verður upp fyri hesum trupulleikum á tann hátt, at broytingar í stýrisskipanarlógini kunnu fremjast við løgtingssinssamtykt og eftirfylgjandi góðkenning við fólkaatkvøðu.

Sostatt kunnu Føroyar gerast limir í ES sambært vanliga tingsamtykt og góðkenning við fólkaatkvøðu, líkamikið hvørja niðurstøðu komið verður fram til, antin tað so er tørvur á broytingum í heimastýrislógini ella ikki.

Mett verður, at hetta er eins trygg mannagongd fyri at mótvirka broytingum í úrtíð av hesi lóg, sum verandi skipan við einum valskeiði ímillum hvørja samtykt.

Fyri at beina eina og hvørja óvissu hesum máli viðvíkjandi av vegnum tekur sami minniluti tí undir við uppskoti meirilutans (Vilhelm Johannesen v. fl.), um so er, at hjálagda broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins harafturat verður samtykt.

VII Broytingaruppskotið er soljóðandi:

§ 56 stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Stk. 2. Løgmaður kann tó staðfesta uppskotið aftaná vanliga samtykt á løgtingi, um so er, at ein meiriluti á fólkaatkvøðu hevur atkvøtt fyri uppskotinum"

§ 56 stk. 2 affattes således:
"Stk. 2. Lagmanden kan dog stadfæste forslaget efter en almindelig vedtagelse i lagtinget såfremt et flertal ved en folkeafstemning har afgivet deres stemme for forslaget."

2. viðgerð 28. juni 1994. Uppskot landsstýrisins við broytingum frá meirilutanum í nevndini samtykt við 25-0 atkvøðum. Broytingaruppskot IV frá minnilutanum Edmund Joensen, Niels

Paula Danielsen og Tordi J. Niclasen fall við 10-0 atkvøðum. Broytingaruppskot V frá minnilutanum Tordi J. Niclasen fall við 12-0 atkvøðum. Broytingaruppskot VI frá minnilutanum Hergeir Nielsen fall við 5-0 atkvøðum. Broytingaruppskot VII frá minnilutanum Edmund Joensen fall við 7-5 atkvøðum. Uppskotini til samtyktar II og III samtykt við ávikavist 25-0 og 22-0 atkvøðum.

3. viðgerð 28. juni 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

191 Broyting í lóg "om jordbrugets fremme"

Ár 1994, hósdagin 24. mars legði Bergur Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í lóg "om jordbrugets fremme".

§ 1.

Í lóg nr. 174 frá 24. mai 1937 "Om jordbrugets fremme" verður gjørd henda broyting:

Aftaná § 50 verður sett:

"**§ 50 a.** Jarðargrunninum verður heimilað at umleggja og niðurskriva verandi lán úr grunninum, um mett verður, at raksturin framyvir kann bera seg. Í hesum sambandi verður grunnurin at áleggja lántakaranum serligar treytir viðvíkjandi rakstri og afturgjalding av restskuldini.

Stk. 2. Grunnurin kann nokta at niðurskriva skuld, um hann metir, at viðkomandi lántakari ikki hevur sýnt evni og skynsemi í rakstrinum. Tó kann ráðið, tá tað snýr seg um landsjørð, krevja festið frá

lagtingslov om ændring i lov om jordbrugets fremme.

§ 1.

I lov nr. 174 af 24. maj 1937 om jordbrugets fremme foretages følgende ændring:

Efter § 50 indsættes:

"**§ 50 a.** Landbrugsfonden bemyndiges til at omlægge og nedskrive eksisterende lån fra fonden, såfremt det anslås at driften fremover kan svare sig. I denne forbindelse skal fonden pålægge låntageren særlige betingelser vedrørende drift og tilbagebetaling af restgælden.

Stk. 2. Fonden kan nægte at nedskrive gæld, såfremt den vurderer, at vedkommende låntager ikke har vist evner og fornuft i driften. Dog kan rådet, når det drejer sig om landsjord, kræve fæstet fra

viðkomandi sambært § 12, stk. 4 í løgtingslóg nr. 59 frá 9. juni 1988 um landsjørð.
Stk. 3. Ráðið kann tá mótvegis komandi lántakara fara fram eftir reglunum ásettar frammanfyri.
Stk. 4. Ráðið setur nevnd mannaða av bitfrøðingi, løgfrøðingi og fíggjarkønum fólki, sum gera tilmæli til ráðið í hvørjum einstøkum føri í samband við heimild eftir § 50 a og b.
Stk. 5. Avgerðir ráðsins kunnu kærast til landsstýrið innan 4 vikur aftaná at avgerðin er tikin."

vedkommende i henhold til § 12, stk. 4 i lagtingslov nr. 59 af 9. juni 1988 om landsjord.
Stk. 3. Rådet kan da overfor vedkommende låntager gå frem efter foranstående fastsatte regler.
Stk. 4. Rådet nedsætter nævn mandet at en agronom, en jurist og en regnskabskyndig person, der gør indstilling til rådet i hvert enkelt tilfælde i forbindelse med hjemmel efter § 50 a og b.
Stk. 5. Rådets afgørelser kan ankes til landsstyret inden 4 uger efter, at afgørelsen er taget."

§ 2.
Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.
Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Sambært gomlu jarðarlógini frá 1937, lóg nr. 174 frá 24. mai 1937 "Om jordbrugets fremme", er í kap. 5 ásett, eftir hvørjum reglum Jarðargrunnurin kann veita lán v.m.

Útbyggingin av landbúnaðinum seinastu 25 árini sambært játtanum og lániheimildum frá løgtinginum hevur givið rúmar ræsur fyri útbygging og framleiðsluøking innan landbúnaðin.

Eins og restin av samfelagnum, hevur eisini jarðarbrúkið sínar trupulleikar, vegna tess, at fleiri av lántakarunum hjá Jarðargrunninum ikki eru førir fyri at rinda lán sín aftur.

Føroya Jarðarráð hevur í høvuðsheitum veitt lán til tveir bólkar av skuldarum. Annar bólkurin er privatir skuldarar, t.v.s. bøndur og ognarmenn, Mjólkarvirki Búnaðarmanna, hagapartar og privatir borgarar, meðan tann stóri bólkurin er kongsbóndurmir.

Hvat viðvíkur fyrsta bólkinum er støðan tann, sum vanliga er galdandi millum lánveitara og lántakara, og sambært teimum vanligu búskaparligu lógunum, har galdandi er, at um lántakarin ikki klárar skyldur sínar, verður skuldin latin til innheintingar við møguligari tvingsilssølu sum fylgju.

Endin kann verða, at ognin - tað verið seg leysafæ ella føst og ogn, sum ráðið og grunnurin hava í veð - verður seld triðjamanni. Ráðið dugir ikki at síggja, at grunnurin sum almennur grunnur uttan serliga lógarheimild - sum í dag ikki finst - hevur heimild til at bera seg øðrvísi at.

Hvat viðvíkur hinum bólkinum er tað serkøkenni, at kongsbøndur ikki eru formligir eigarar av tí, sum lán er veitt til, men stendur Føroya Jarðarráð sum eigari og grunnurin sum lánveitari, meðan bóndin er skuldari, og hóast lánið, t.d. eitt fjóslán, verður fult afturgoldið,

stendur ráðið framvegis sum eigari av fjósinum sum hoyrandi til festið.

Frá gamlari tíð hevur hetta verið grundgevingin fyri, at lán úr Jarðargrunninum hava verið veitt við langari avdráttartíð og sera lágari rentu.

Fylgjan av at ein bóndi ikki heldur afturgjaldstreytirnar er ásett í § 12, stk. 4, at Jarðarráðið skal taka støðu festarans til viðgerðar og áleggja honum at fáa viðurskiftini í rættlag.

Verður áheitanin ikki fylgd, hevur Jarðarráðið rætt til sambært somu grein at siga festimálið upp, og er hetta eisini samsvarandi gomlu lógini. Hetta merkir, at ráðið - umframt at royna at fáa peningin inn - kann siga festið upp.

Sambært roknskapi hjá Føroya Jarðarráð vóru við ársenda 1992 veitt 161 fjóslán uppá tilsamans 86,5 mió. kr.

Fleiri av fjóslánunum verða ikki yvirhildin, og útlitini fyri, at lántakarin við vanligum rakstri og tí prísi, sum mjólkin í dag hevur, hevur møguleika fyri at rinda aftur skuldina eru ring. Fylgjan av hesum er sambært lógini, at Jarðarráðið kann taka festið frá viðkomandi.

At gera hetta verður ikki hildið at vera heppið vísandi til, at festirættirin frá gamlari tíð er knýttur at familjum, og kann hetta hava við sær, at festi við lívsarvingum verður tikið úr familjum, umframt at tann nýggi festarin, alt annað líka, skal taka við gomlu skuldini.

Ein annar møguleiki, sum vist kann verða á, er at tann parturin av garðinum, sum ikki ber seg, verður tikin burtur úr á tann hátt, at festarin t.d. fær niðurfryst fjóslánið, afturfyri at hann heldur uppat við mjólkarframleiðsluni, soleiðis at hesin parturin av rakstrinum av garðinum verður tikin burturúr. Bóndin kann tá sjálvboðin velja um hann vil leggja mjólkarframleiðsluna niður ella ikki. Aiternativið er, at hann kann missa garðin.

Til tess at gagnnýta teir bygningar, sum soleiðis verða niðurlagdir, kundi hesir verið nýttir til annað endamál, m.a. kjøtframleiðslu.

Hvat viðvíkur spurninginum um Jarðarráðið uttan víðari kann niðurfrysta skuld og møguliga eftirgeva hana er ráðið av teirri fatan, at við tí lógargrundarlagi, sum nú er, hevur ráðið ikki heimild til tess vísandi til, at lógin positivt hevur tikið støðu til, hvat gerast skal, um so er, at lántakari, sum er kongsbóndi, ikki klárar skyldur sínar.

Mett verður, at ráðið eftir galdandi lóg hevur heimild at fremja skuldarsanering eftir hesum reglum:

1. Ein avtalaðan gjaldsteðg.
2. Tann parturin av festinum, sum ikki ber seg, verður niðurlagdur.
3. Festimálið verður sagt upp.

Viðv. 1. Hesin spurningur eigur at skiljast soleiðis, at skipað verður so fyri, at raksturin av garðinum verður undir eftirliti, og at øll inntøka av garðinum í fyrsta lagi verður nýtt til vanligan rakstur, t.v.s. tøð, fóður, olju, el og løn til triðjamann, í øðrum lagi gjald til skuldaran til livsins uppihald og í triðja lagi gjald av rentum og avdráttum av láni til Jarðargrunnin.

Hendia skipan hevur við sær, at rakstrarstaðið og lánistaðið verða knýtt saman, soleiðis at inntøka forvunnin av rakstrar- og lánistaðnum, ikki verður nýtt til annað enn til rakstur og niðurgjalding av íløguni.

Skipað eigur at verða soleiðis fyri, at ráðið í teimum einstøku økjunum tilnevnir ein uttanveltaðan roknskaparkønan til at hava neyðugt eftirlit við, at skipanin verður hildin, og at mannagongdin verður avtalað við eitt nú fastar avtakarar um, hvussu pengastreymurin verður stýrdur.

Viðv. 2. Hetta ber í sær, at tann heimildin, sum Føroya Jarðarráð hevur í jarðarlógini til at taka festið aftur, kann verða nýtt soleiðis, at ein partur av festinum verður tikin aftur, nevniliga t.d. fjóslánið og íløgan í fjósið, og merkir hetta, at tann parturin av garðinum verður niðurlagdur, og bóndi ikki er bóndi í tí sambandi longur.

Viðv. 3. Henda heimild er heinleiðis ásett í jarðarlógini, og skal Jarðarráðið tá fyrst royna at fáa eina skipan í lag, og í øðrum lagi, um tað ikki letur seg gera, at siga festimálið upp.

Í lógaruppskotinum stk. 4 verður ein nevnd sett at geva fakligt tilmæli til ráðið. Henda fakliga metingin verður eisini at liggja til grund, tá kærumál skulu avgerast.

1. viðgerð 12. apríl 1994. Málið varð heint í figgjarnevndina, ikki liðugt viðgjørt vegna samgonguslit.

192 Løgtingslóg um ískoytisveiting til forsorgarstuðul vegna tørvandi arbeiði

Ár 1994, fríggjadagin 25. mars legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um ískoytisveiting til forsorgarstuðul vegna tørvandi arbeiði.

§ 1. Til uppihaldarar kann veitast ískoytisveiting til forsorgarhjálpina vegna tørvandi arbeiði sambært reglunum í hesi lóg.

lagtingslov om tillægsydelse til forsorgshjælp på grund af svigtende arbejdsmuligheder.

§ 1. Til forsørgere kan der ydes tillægsydelse til forsorgshjælpen på grund af svigtende arbejdsmuligheder efter reglerne

§ 2. Ískoytisveitingin kann veitast uppihaldarum, sum hava rætt til forsorgarhjálp sambært § 9, stk. 3 í "Lov for Færøerne om offentlig forsorg".
Stk. 2. Ískoytisveiting kann eisini veitast uppihaldarum, hvørs útgjald frá Arbeiðsloysistryggingini er minni enn 125% av fólkapensións-grundarupphæddini við pensiónsískoyti.

§ 3. Ískoyti saman við forsorgarhjálpini eftir "Lov for Færøerne om offentlig forsorg" ella útgjaldi frá Arbeiðsloysistryggingini kann í mesta lagi vera 125% av fólkapensiónsgrundarupphæddini við pensiónsviðbót.

§ 4. Treytir og reglur annars fyri forsorgarhjálp eftir § 9 sambært "Lov for Færøerne om offentlig forsorg" eru eisini galdandi fyri ískoytisveitingina.

§ 5. Almannastovan umsitur ískoytisveitingina, sum verður útgoldin saman við møguligari forsorgarhjálp eftir § 9 í "Lov for Færøerne om offentlig forsorg".

§ 6. Landsstýrið kann áseta nærri reglur fyri ískoytisveitingini.

§ 7. Avgerðir Almannastovunnar sambært hesi lóg kunnu innan 4 vikur kærast til Kærunevndina í almannamálum.

§ 8. Hendan lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

i denne lov.

§ 2. Tillægsydelsen kan ydes forsørgere, der er berettiget til forsorgshjælp jvf. § 9, stk. 3 i Lov for Færøerne om offentlig forsorg.
Stk. 2. Tillægsydelsen kan også ydes forsørgere, hvis udbetaling fra Arbejdsløshedsforsikringen er mindre end 125% af folkepensionens grundbeløb og pensionstillæg.

§ 3. Tillægsydelsen sammen med forsorgshjælpen efter Lov for Færøerne om offentlig forsorg eller udbetalingen fra Arbejdsløshedsforsikringen kan højst udgøre 125% af folkepensionens grundbeløb og pensionstillæg.

§ 4. Betingelser og regler i øvrigt for retten til forsorgshjælp efter § 9 i Lov for Færøerne om offentlig forsorg er også gældende for tillægsydelsen.

§ 5. Almannastovan administrerer tillægsydelsen, som bliver udbetalt sammen med eventuel forsorgshjælp efter § 9 i Lov for Færøerne om offentlig forsorg.

§ 6. Landsstyret kan fastsætte nærmere regler for tillægsydelsen.

§ 7. Almannastovans afgørelser efter denne lov kan inden 4 uger påklages til Det sociale Ankenævn.

§ 8. Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Endamálið við lógaruppskotinum er at kunna veita barnafamiljunum eitt ískoyti til forsorgarhjálpina, soleiðis at tey innanfyri ein avmarkaðan, men rímiligan útreiðslukarm kunnu vera verandi í egnum heimi.

Tá Arbeiðsloysistryggingarskipanin varð sett í gildi í 1992, varð forsorgarlógin samstundis broytt soleiðis, at forsorgarstuðulin vegna tørvandi arbeiði í mesta lagi kundi vera

fólkapensiónsgrundarupphædd við pensiónsviðbót, umframt barnaviðbót fyri hvørt barnið undir 18 ár.

Serstakliga hjá barnafamiljunum hevur tað vist seg at vera nærum ógjørligt at klára seg við vanligu forsorgarhjálpini vegna tørvandi arbeiði, og hesar familjur hava ikki nakran møguleika fyri at rinda tær mest neyðugu útreiðslurnar til mat, klæði, hita, ijós ella bústað.

Tað hevur tí verið ein fyritreyt fyri, at fólk kunnu verða verandi í egnum heimi, at Almannastovan veitti teimum ískoyti eftir undantaksregluni í § 9, stk. 4 í forsorgarlógini. Hendan undantaksregla heimilar, at tað í serligum førum og eftir eini ítøkiligari meting kann veitast ein hægri upphædd tó treytað av, at umsøkjarin antin hevur óvanligar stórar uppihaldsskyldur ella høgar húsaútreiðslur.

Almannastovan hevur nú gjørt landsstýrið vart við, at umsitingin av forsorgarstuðlinum vegna tørvandi arbeiði er blivin sera trupul. Hetta er m.a. orsakað av, at serstakliga síðani ALS fór undir tað "rullandi" útgjaldið, er undantaksreglan í § 9, stk.4 í forsorgartógini nú nýtt í so nógvum førum, at talan so at siga er um, at undantaksreglan í verki er blivin til høvuðsreglu.

Almannastovan hevur víst á, at um tað varð møguligt hjá teimum at veita barnafamiljum 125% av fólkapensiónsupphæddini, so fekk Almannastovan betri hjálpt fleiri familjum, umframt at hetta hevði verið ein munandi lætti í dagligu umsitingina av forsorgarstuðlinum.

Í hesum liggur eisini, at miðað verður ímóti at fáa eitt meira eintýðugt og fast hjálparstøði viðvíkjandi bústaðarútreiðslum. Ætlanin er at kr. 3.400,- verður sett sum hægsta húsaútreiðsla, ið veitast kann yvir forsorgarlógini. Hendan upphædd svarar til rentur og avdráttir av kr. 500.000,- til lága rentu yvir 30 ár.

Almannastovan upplýsir, at hóast ískoytisveiting verður veitt barnafamiljum, so kemur hetta ikki at hava meirútreiðslur við sær fyri landskassan. Orsøkin til hetta er, at tilest allar familjurnar sum er fáa forsorgarstuðul frá Almannastovuni, men eftir undantaksregluni.

1. viðgerð 7. apríl 1994. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 26. apríl 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1994 og eftir 1. viðgerð beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur eisini fingið skriv dagfest 7. apríl 1994 frá Sosialráðgevarafelag Føroya, sum m.a. er eitt mótmæli ímóti orðingini í uppskoti landsstýrisins.

Í skrivi dagfest 13. apríl 1994 heitir landsstýrið á almanna- og heilsunevndina um at broyta § 3 í uppskotinum so uppskotið eisini umfatar barnaviðbót.

Á fundi vóru eisini umboð fyri Sosialráðgevarafelag Føroya, Kristian Magnussen. Eyðvør

Mortensen og Lena Rauff Nielsen. Somuleiðis var Eyðun Jensen, leiðari á sosiala deild í býráðnum í Havn, á fundi.

Nevndin beitir á landsstýrið um at taka uppaftur til viðgerðar, í samráð við Sosialráðgevarafelag Føroya, leiðbeinandi skriv landsstýrisins nr. 1/92 um fyrihils hjálp sambært forsorgarlógini § 9, stk. 3 (arbeiðsloysi).

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins, við nevndu broyting í § 3, og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

§ 3 verður orðað soleiðis: "Ískoyti saman við forsorgarhjálpini eftir "Lov for Færøerne om offentlig forsorg" § 9, stk. 3 ella útgjaldi frá Arbeiðsloysistryggingini kann í mesta lagi vera 125% av fólkapensiónsgrundaruppfæddini við pensiónsviðbót. Herumframt verður veitt barnaviðbót fyri hvørt barnið."

§ 3 formuleres således: "Tillægsydelsen sammen med forsorgshjælpen efter "Lov for Færøerne om offentlig forsorg" § 9, stk. 3 eller udbetalingen fra Arbejdsløshedsforsikringen kan højst udgøre 125% af folkepensionens grundbeløb og pensionstillæg. Herudover ydes børnetillæg for hvert barn."

2. viðgerð 27. apríl 1994. Uppskot landsstýrisins við broyting frá meirilutanum í almanna- og heilsunevndini samtykt við 27-0 atkvøðum.

28. apríl 1994 legði almanna- og heilsunevndin fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

3. viðgerð av tingmáli nr. 192/1993: Løgtingslóg um ískoytisveiting til forsorgarstuðul vegna tørvandi arbeiði

§ 3 verður orðað soleiðis: "Ískoyti saman við forsorgarhjálpini eftir "Lov for Færøerne om offentlig forsorg" § 9, stk. 3 ella útgjaldi frá Arbeiðsloysistryggingini kann í mesta lagi vera upphædd svarandi til 125% av fólkapensiónini, við ískoyti fyri hvørt barnið svarandi til barnaviðbót eftir "Lov for Færøerne om folkepension"."

§ 3 formuleres således: "Tillægsydelsen sammen med forsorgshjælpen efter "Lov for Færøerne om offentlig forsorg" § 9, stk. 3 eller udbetalingen fra Arbejdsløshedsforsikringen kan højst udgøre beløb svarende til 125% af folkepensionen, med tillægsydelse for hvert barn svarende til børnetillæg efter "Lov for Færøerne om folkepension"."

3. viðgerð 28. apríl 1994. Broytingaruppskotið samtykt við 31-0 atkvøðum. Uppskotið soleiðis broytt endaliga samtykt við 31-0 atkvøðum.

Lóg nr. 72 frá 10. mai 1994.

193 Ábeitan frá ákæruvaldinum sambært § 728a í rættarskipannarlógini um, at løgtingið gevur loyvi til, at Heini O. Heinesen, løgtingsmaður, verður ákærdur fyri brot á § 183, stk. 3 í revsilógini

Ár 1994, 15. apríl legði formansskapurin fram soljóðandi:

Føroya løgting hevur frá Føroya Landfúta fingið skriv, dagfest 26. november 1993, har biðið verður um, at løgtingið samtykkir, sambært § 728a í rættarskipannarlógini, at ákæra eftir § 183, stk. 3 í revsilógini verður at fremja móti Heina O. Heinesen, tingmanni, og tí verður tingið at taka støðu til um immuniteturin verður tikin frá nevnda tingmanni.

Hjálagt er nevnda skriv landfútans.

Til tess at lýsa høvuðstáttin í hesum máli, verur fylgjandi upplýst:

Í grundlógini § 57, 1. punktum, stendur: "Intet medlem af Folketinget kan uden dettes samtykke tiltales eller underkastes fængsling af nogen art, med mindre hann er grebet på fersk gerning."

Henda regla er at skilja sum ein verja hjá fólkatinginum ella parlamentinum mótvegis meiri ella minni tilvildarligum rættarsóknum frá stjórnarsíðu. Tað týðandi í hesi reglu er, at eitt hvørt parlament, fólkating ella løgting, má verja um immunitetin hjá limum sínum og verður eitt slíkt loyvi givið, er hetta hert galdandi fram til næsta val.

Í § 24 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya í sermálum verður sagt: "Meðan løgtingið situr, má løgtingsmaður ikki uttan tingsins samtykt verða átalaður ella settur fastur á nakran hátt, uttan so er, at hann verður tikin í brotsgerð.

Eingin løgtingsmaður kann, uttan tingsins samtykt verða kravdur til svars uttantings fyri tað, hann hevur talað innantings".

Í § 728a í rettarskipannarlógini stendur: "Ingen lagtingsmand kan tiltales eller underkastes fængsling af nogen art uden lagtingets samtykke, medmindre hann er grebet på fersk gerning.

Stk. 2: For sine ytringer i lagtinget, kan intet af dets medlemmer uden tingets samtykke drages til ansvar udenfor samme."

Omanfyri nevndu reglur eru at tulka soleiðis, at tær skulu veita tinglimum verju í óvanligum støðum. Tað er lítið sannlíkt, at tað ber til at verja limir í tingum effektivt í politiskum krepputíðum, um ikki hesi prinsippir, ið her liggja til grund verða framd, tá viðurskiftini eru vanlig ella normal.

Orðingin "tiltale" skal í samsvar við grundlógina og vanliga málnýtslu, skiljast sum vanlig ákæra til straff og fevnir sostatt ikki um privat sakarmál, sjálvt um hesi ganga út uppá revsing verður áløgd.

Í Danmark hevur fólkatingið altíð givið loyvi til at taka immuniteitin samboert § 57, 1. punktum, talan er um eina samtykt í tinginum og skal henda viðgerð fara fram tvær ferðir eftir galdandi tingskipan.

Løgtingsskrivstovan hevur kannað um fordømi eru í løgtinginum um at parlamentariski immuniteturin er tikin frá tinglimi og er hjáløgd ein frágreiðing frá Landsskjalasavninum viðvíkjandi málinum um Thorstein Petersen, sála.

Í fyriliggjandi málið viðvíkjandi Heina O. Heinesen, tingmanni, er tala um, at tingmaðurin verður ákærdur fyri brot á § 183, stk. 3.

§ 183 í revsilógini er soljóðandi: "Den, der med forsæt til skade på andres person eller formue forvolder sprængning, spredning af skadefoldende luftarter, oversvømmelse, skibbrud, jernbane- eller anden transportulykke, straffes med fængsel indtil 12 år.

Stk. 2. Foretages en af de i stk. 1 nævnte handlinger under de i § 180 angivne omstændigheder, er straffen fængsel indtil på livstid.

Stk. 3 Begås forbrydelsen uagtsomt, er straffen bøde, hæfte eller fængsel indtil 2 år."

Upplýsast skal, at í fólkatinginum er vanliga einki orðaskifti um slík mál, tó er eitt undantak og tað var tá ið málið um Glistrup fyri árum síðani var frammi.

Tað er sostatt einki sum kann forbjóða at orðaskifti kann verða um biðið verður um orðið. Fyriliggjandi uppskot til samtyktar skal eftir § 12 í tingskipanini hava tvær viðgerðir.

At enda skal upplýsast, at tingskipan Føroya Løgtings er heldur títil og ikki so útbygd á ymsum økjum sum ynskiligt. Í tingskipanini hjá fólkatinginum er tann regla sett í § 25, stk. 2, at mál, ið koma til fólkatingið viðvíkjandi § 57 í grundlógini - immunitetsmál - fara beinleiðis til formansskapin, ið síðani avgreiðir álit til tingið og skal hetta eftir vanligum reglum hava tvær viðgerðir. Í tingskipanini hjá løgtinginum er eingin slík regla og hevur tí verið mett, at beinast var at bruka somu reglu sum fólkatingið nýtir í slíkum føri. Grundgevingin er, at slík mál eru so háttað, at tey eiga at fáa viðgerð so sum tilskilað er í

erva.

Sostatt verður sett fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Út frá hesum leggur formansskapurin mállð til løgtingsins støðutakan, um at áheitan Landfútans um at immuniteturin verður tikin frá frá Heina O. Heinesen, tingmanni, í sambandi við ákæru eftir revsulógini, verður gingin á møti.

1. viðgerð 21. apríl 1994. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 27. apríl 1994. Málið varð aftur beint til formansskapin við 17-0 atkvøðum.

27. apríl 1994 løgdu løgtingsmenninir Hergeir Nielsen, Jacob Lindenskov, Birgir Danielsen, Helena Dam á Neystabø og Niels Pauli Danielsen fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at útvega løgtinginum yvirlit yvir øll tey mál, sum eru kærd til fútan av landsstýrinum og landsins stovnum, har hann ikki hevur sett fram ákæru: og hví so ikki er gjørt.

Ikki liðugt viðgjørt vegna samgongurlit.

194 Grannskoðan av almennum roknskapum - løgtingslóg um løgtingsgrannskoðararnar

Ár 1994, friggjadagin 15. apríl legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Felagsálit

í

løgtingsmálunum nr. 194/93: Grannskoðan av almennum roknskapum - løgtingslóg um løgtingsgrannskoðararnar. (174/92).
nr. 195/93: Grannskoðan av almennum roknskapum - løgtingslóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum v.m. (175/92).
og nr. 196/93: Grannskoðan av almennum roknskapum - reglugerð um val og virki løgtingsgrannskoðaranna (176/92).

Málini eru løgd fram av formansskapi løgtingsins tann 14. apríl 1993 og eftir 1. viðgerð 19. apríl 1993 beind í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málini saman við løgtingsmáli nr. 162/92: Løgtingslóg um landsins almennu roknskaparhald v.m.

Samhært upprunauppskotunum skuldu allar lógirnar fáa gildi tann 1. januar 1994, men seinni hava løgtingsgrannskoðararnir mælt til, at lógirnar verða settar í gildi 1. januar 1995.

Fíggjarnevndin hevur bíðið landsgrannskoðaran um eitt ummæli, sum ikki enn er komið, og út frá tí, at lógirnar ikki koma í gildi fyrr enn í fyrsta lagi 1. januar 1995, mælir fíggjarnevndin til, at málini verða viðgjørd av fíggjarnevndini sum millumtinganevnd.

Tí setir ein samd fíggjarnevnd fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at løgtingsmálini nr. 194/93, 195/93 og 196/93 verða viðgjørd av fíggjarnevndini sum millumtinganevnd.

2. viðgerð 21. apríl 1994. Samtykt at beina málið í millumtinganevnd við 26-0 atkvøðum.

195 Grannskoðan av almennum roknskapum - løgtingslóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum v.m.

Sí felagsálit í løgtingsmáli 194/1993.

196 Grannskoðan av almennum roknskapum - reglugerð um val og virki løgtingsgrannskoðaranna

Sí felagsálit í løgtingsmáli 194/1993.

197 Ígildissetan fyri Føroyar av "Lov om sociale ydelser på Færøerne"

Ár 1994, fríggjadagin 15. apríl legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið mælir ríkismyndugleikunum til, at "Lov om sociale ydelser på Færøerne" verður sett í gildi í Føroyum.

Viðmerkingar

Sum kunnugt høvdu grannskoðanarfrágreiðingarnar fyri sosialu útreiðslunum í Føroyum við sær, at allur stuðulin úr statskassanum til tær sosialu útreiðslurnar í Føroyum frá 1. juli 1993 varð umlagdur til blokkstuðul. Samstundis varð avtalað, at tað skuldi gerast rammulóg fyri almannaøkið, sum heimilaði heimastýrinum at áseta nærri reglur fyri sosialum veitingum og tiltøkum.

Fyriliggjandi uppskot til "Lov om sociale ydelser for Færøerne" er rammulógin, sum heimilar og áleggur heimastýrinum at skipa fyri tiltøkum, sum í rímiligan mun kunnu fyrbyrgja og bøta um sosialar trupulleikar hjá fólki í Føroyum.

Sum tað framgongur í viðmerkingunum til lógaruppskotið, so er við hesum talan um stórar broytingar í mun til í dag. So hvørt sum heimastýrið við løgtingslógum útfyllir rammulógina, hevur heimastýrið eisini ta fullu ábyrgdina av at hava eftirlit við ásettu reglunum sambært løgtingslógunum, bæði innihaldsliga og hvussu tær verða umsitnar av fyrisitingini. Uppá longri sikt má roknast við, at hendan ábyrgdin kemur at viðføra, at tað verður neyðugt við størri arbeiðsorku enn tann verandi á Almanna- og heilsudeildini á landsskrivstovuni.

Ábyrgdin hevur áður ligið hjá Almannamálaráðnum í Danmark.

Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið hevur Almannamálaráðið ikki skyldu til at ansa eftir, at Heimastýrið ger tær løgtingslógir, ið skulu koma í staðin fyri tær donsku fólkatingslógirnar. Skipanin inniber eisini, at Almannamálaráðið ella danska stjórnin ikki hava rættarligu skyldu til at hava eftirlit við innihaldinum og umsitingini av teimum løgtinslógum v.m., sum Heimastýrið ger við heimild í fyriliggjandi rammulóg.

Inntil vit sjálvi hava fingið gjørt nýggjar løgtingslógir um sosialar veitingar og tiltøk, verða tær donsku fólkatingslógirnar verandi í gildi. So leingi hesar donsku fólkatingslógirnar eru í gildi í Føroyum, er tað eisini almannamálaráðið, ið hevur ábyrgdina á økinum. Men tá løgtingið hevur samtykt nýggjar løgtingslógir, yvirtekur Heimastýrið eisini rættarligu ábyrgdina á økinum. Samstundis verða tær donsku fólkatingslógirnar strikaðar, og tá hevur almannamálaráðið ikki longur ábyrgdina fyri almannaøkinum í Føroyum.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið framgongur, at danska stjórnin roknar við, at Heimastýrið innan tey næstu árini ger tær neyðugu løgtingslógirnar. Hetta verður tó nærri avtalað millum landsstýrið og almannamálaráðharran.

Lógaruppskotið viðførir í prinsippinum eina broyting viðvíkjandi flyting av pensiónum millum Føroyar og Danmark. Støðan viðvíkjandi pensiónum er í dag, at ein persónur, sum hevur fingið tillutaða fólka- ella avlamispensión í Føroyum, kann flyta til Danmarkar og har uttan umsókn fáa pensión útgoldnað. Hetta er grundað á, at við verandi lóggávu eru pensiónsskipanirnar í Føroyum og Danmark nærum eins, og tí er hendan automatiska skipanin møgulig.

Henda skipan heldur uppat, tá vit fáa eina føroyska løgtingslóg um pensiónir. Tá skulu føroyingar eins og borgarar frá fremmandum londum, søkja um pensión, tá teir flyta til Danmarkar. Hetta er ein logisk fylgja av, at tað ikki er gjørligt hjá donsku stjórnini í dag at

vita, hvørja pensiónsskipan Heimastýrið kann hava ynski um at fremja. Tað verður tó eisini í viðmerkingunum til lógaruppskotið sagt, at tá Heimastýrið hevur ásett reglur viðvíkjandi pensiónum, so kann spurningurin um automatiska flyting av pensión millum Føroyar og Danmark takast upp aftur. Sum líknandi dømi kann vísast til samskipanaravtaluna millum Føroyar og Danmark um arbeiðsloysistrygging.

1. viðgerð 21. apríl 1994. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina. Burturdottið vegna samgonguslit.

FL jnr. 1010-11/93.

198 Broyting í løgtingslóg um tær kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentinum, kommunalan kreppulánsgrunn o.a.m.

Ár 1994, friggjadagin 15. apríl legði Signar á Brúnni, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tær kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentinum, kommunalan kreppulánsgrunn v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 189 frá 8. desember 1993 um tær kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentinum, kommunalan kreppulánsgrunn v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á lógini verður broytt til:
   "Løgtingslóg um kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentinum, kommunalan veðhaldsgrunn o.a.m."
2. Aftaná § 1 verður sum nýggj § 1 a sett:

lagtingslov om ændring i lagtingslov om de kommunale budgetter, fastsættelse af kommuneskatteprocenten, kommunal krisefond m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 189 af 8. december 1993 om de kommunale budgetter, fastsættelse af kommuneskatteprocenten, kommunal krisefond m.v. foretages følgende ændringer:

1. Lovens titel ændres til:
   "Lagtingslov om de kommunale budgetter, fastsættelse af kommuneskatteprocenten, kommunal garantifond m.v."
2. Efter § 1 indsættes som ny § 1 a:
   "**§ 1 a.** Ligningsprocenten for kom-

"§ 1 a. Líkningarprosentið fyri kommunuskatt fyri inntøkuárið 1994, sum ásett er eftir § 1 kann tó eftir avgerð bygda(r)ráðsins, og við góðkenning frá landsstýrinum, verða ásett av nýggjum í inntøkuárinum 1994. Tað tá ásetta líkningarprosentið fyri kommunuskatt er galdandi fyri alt inntøkuárið 1994.

Stk. 2. Eisini verður landsstýrinum heimilað at lækka kommunusakattaprosentið, um serlig viðurskifti eru, og landsstýrið metir, at grundarlag er fyri tí.

Stk. 3. Áðrenn avgerð um at ásetan av nýggjum líkningarprosenti fyri kommunuskatt í 1994 verður tikin eftir stk. 1, verður ársfíggjarætlanin fyri 1994 endurskoðað, og skal hava 2 viðgerðir í bygda(r)ráðnum við í minsta lagi 8 døgum ímillum. Beinanvegin ársfíggjarætlanin er samtykt av bygdaráðnum, verður hon send landsstýrinum til góðkenningar. Landsstýrið setir við kunngerð freist fyri, nær ársfíggjarætlanin skal verða samtykt og góðkend av landsstýrinum".

3. Í § 9, stk. 1 verða orðini "kommunalan kreppulánsgrunn" broytt til: "kommunalan veðhaldsgrunn" og í § 9, stk. 5 verða orðini "kommunala kreppulánsgrunnin" broytt til: "kommunala veðhaldsgrunnin".

4. § 9, stk. 7 verður orðað soleiðis:
"**Stk. 7.** Grunnurin veitir veðhald fyri lánum hjá kommunum. Landsstýrið setir í kunngerð nærri reglur um virki grunsins og fyrisitingina av grunninum og reglur um avtøku av grunninum."

5. Aftaná § 9 verður sum nýggj § 9 a sett:
"**§ 9 a.** Í sambandi við eina samlaða umlegging av skuldini hjá kommununum veita kommunurnar sínámillum veðhald fyri lánum hjá hvørjari aðrari. Kommunurnar veita veðhald við eini upphædd svarandi til upp til 5% av tí til eina og hvørja tíð verandi restmuneskat for indkomståret 1993, der er fastsat efter § 1, kan dog efter bygderådets afgørelse og med landsstyrets godkendelse fastsættes på ny i indkomståret 1994. Det da fastsatte ligningsprocent for kommuneskat er gældende for hele indkomståret 1994.

Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til at sænke kommuneskatteprocenten, såfremt særlige omstændigheder foreligge og landsstyret finder, at grundlag er herfor.

Stk. 3. Inden afgørelse om fastsættelse af nyt ligningsprocent for kommuneskat i 1994 træffes efter stk. 1, revideres årsbudgettet og skal dette have 2 behandlinger i bygderådet med mindst 8 dage imellem. Umiddelbart efter at årsbudgettet er vedtaget af bygderådet sendes det landsstyret til godkendelse. Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse fristen for, hvornår årsbudgettet skal være vedtaget og godkendt af landsstyret."

3. I § 9, stk. 1 ændres ordene "kommunal krisefond" til: "kommunal garantifond" og i § 9, stk. 5 ændres ordene "den kommunale krisefond" til: "den kommunale garantifond".

4. § 9, stk. 7 affattes således:
"**Stk. 7.** Fonden stiller garanti for kommuners lån. Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse nærmere regler om fondens virksomhed og administration og om ophævelse af fonden."

5. Efter § 9 indsættes som ny § 9 a:
"**§ 9 a.** I forbindelse med en samlet omlægning af kommunernes gæld, yder kommunerne indbyrdes sikkerhed med et beløb svarende til op til 5% af den til enhver tid værende restgæld, der kommer under omlægningen. Det beløb, hver kommune stiller sikkerhed med, fastsættes i forhold til skattegrundlaget i kommunen.

Stk. 2. Landsstyret bemyndiges om nødvendigt til på kommunernes vegne at underskrive nødvendige lånedoku-

skuld, sum kemur undir umleggingina. Upphæddin, sum hvør kommuna sær veðheldur við, verður áseett í mun til skattagrundarlagið í kommununi.

Stk. 2. Landsstýrinum verður heimilað, um neyðugt, vegna kommunurnar at undirskriva neyðug lánsskjøl viðvíkjandi veðhaldinum.

Stk. 3. Landsstýrið setur við kunngerð nærri reglur um tey í stk. 1 nevndu viðurskifti.

Stk. 4. Í 1996 og fylgjandi ár skulu kommunurnar rinda upp til 1% av skattagrundarlagnum til kommunala veðhaldsgrunnin. Reglurnar í § 9, stk. 3-7 verða nýttar samsvarandi."

6. § 10, stk. 2 verður strikað.
7. § 10, stk. 3 verður hereftir stk. 2 og verður orðað soleiðis:

   "**Stk. 2.** Reglurnar í § 43, stk. 2, 2. pkt., § 46, stk. 7, 2. pkt., § 47, stk. 1, 3. pkt. og § 59 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt og § 29 og § 31, stk. 1 og stk. 2 í løgtingslóg nr. 45 frá 29. juni 1972 um føroysku kommunurnar verða ikki í nýtslu meðan lógin er í gildi."
8. § 10, stk. 4 verður hereftir stk. 3.
9. Sum nýggj § 11 verður sett:

   "**§ 11.** Uppskot um endurskoðan av lógini, kommunulógini og kommunevallógini verður lagt fyri løgtingið í seinasta lagi ólavsøkutingsetuna 1995.

   Stk. 2. Landsstýrið setur nevnd til kanningar av lóggávuni sum nevnd er í stk. 1, sum í seinasta lagi á vári 1995 skal koma við frágreiðing og tilmæli til landsstýrið.

   Stk. 3. Tær útreiðslur, ið standast av nevndararbeiðinum, rindar landskassiu."

§ 2.

Henda lóg tær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, jbr. tó stk. 2.

Stk. 2. § 9 a verður sett í gildi við kunngerð, tá endaliga úrslitið av samráðingmenter vedrørende garantien.

Stk. 3. Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse nærmere regler om de i stk. 1 nævnte forhold.

Stk. 4. I 1996 og følgende år skal kommunerne betale op til 1% af skattegrundlaget til den kommunale garantifond. Reglerne i § 9, stk. 3-7 finder tilsvarende anvendelse.

6. § 10, stk. 2 udgår.
7. § 10, stk. 3 bliver herefter stk. 2 og affattes således:

   "**Stk. 2.** Bestemmelserne i § 43, stk. 2, 2. pkt., § 46, stk. 7, 2. pkt., § 47, stk. 1, 3. pkt. og § 59 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat og § 29 og § 31, stk. 1 og 2 i lagtingslov nr. 45 af 29. juni 1972 om de færøske kommuner benyttes ikke medens loven er i kraft."
8. § 10, stk. 4 bliver herefter stk. 3.
9. Som ny § 11 indsættes:

   "**§ 11.** Forslag om revidering af loven, kommunecloven og kommunevalgloven forelægges lagtinget senest olajsamlingen 1995.

   Stk. 2. Landsstyret nedsætter et udvalg til undersøgelse af lovgivningen, der er nævnt i stk. 1, som senest i foråret 1995 skal afgive en redegørelse og indstilling til landsstyret.

   Stk. 3. Udgifterne til udvalgsarbejdet udredes af landskassen."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen, jfr. dog stk. 2.

Stk. 2. § 9 a sættes i kraft ved bekendtgørelse, når det endelige resultat af

:inum um umleggingina av kommunuskuldini fyriliggur.

Stk. 3. Um 1/2 av teimum føroysku kommununum, ella um kommunur við í minsta lagi 3/4 av íbúgvunum í kommununum í seinasta lagi 3 vikur aftaná, at endaliga úrslitið av samráðingunum um umleggingina av kommunuskuldini fyriliggur, boða landsstýrinum frá, at tær ikki kunnu góðkenna samráðingarúrslitið, verður § 9 a ikki sett í gildi.

forhandlingerne om omlægningen af kommunegælden foreligger.

Stk. 3. Såfremt 1/2 af de færøske kommuner, eller om kommuner med mindst 3/4 af befolkningen i kommunerne senest 3 uger efter det endelige resultat af forhandlingerne om omlægning af kommunegælden foreligger meddeler landsstyret, at de ikke kan godkende forhandlingsresultatet, sættes § 9 a ikke i kraft.

Viðmerkingar:

Føroya Banki hevur játtað at átaka sær at taka upp samráðingar við lángevararnar hjá kommununum, um aftargjaldingina av kommunuskuldini á tí grundarlagnum, sum "kommunubólkurin" t. e. 7 tær størstu kommununar og Føroya Kommunufelag, hava skotið upp. Nærum allar kommununar hava undirskrivað eina fulltrú til bankarnar at samráðast vegna kommununar um umlegging av kommunuskuldini. Í skrivinum til bankarnar frá kommununum verða meginreglurnar fyri umleggingini ásettar. Hesar eru:

1. Umleggingin kann, umframt beinleiðis kommunulán, umfata skuld hjá kommunalum stovnum, sum t.d. IRF. Hetta hevur við sær, at umleggingin kann koma at umfata skuld uppá uml. 2.3 mia. kr., men hetta verður neyvari ásett undir samráðingunum.
2. Miðað verður ímóti, at avdráttartíðin verður 20 ár, og rentan verður 7% ella lægri. Roknast má við, at lángevararnir fara at krevja, at rentan kann broytast aftaná eitt ávíst áramál.
3. Leysaskuldin uppá uml. 30-35 mió. kr. verður endurfiggjað av tí peningastovninum, sum kommunan nýtir sum bankasamband.
4. Avrokningin millum land og kommunur viðvíkjandi lógarbundnum útreiðslum og øðrum felagsútreiðslum kann ikki broytast soleiðis, at kommununar koma í vanda fyri ikki at hava nóg mikið av gjaldføri.
5. Veitt verður eitt felagskommunalt veðhald uppá 5% av tí til eina og hvørja tíð verandi restskuld, sum kemur undir skipanina. Veðhaldið og inngjaldið til veðhaldsgrunnnin skal altíð verða minst 5% av restskuldini undir skipanini. Veðhaldið verður lutað á tær einstøku kommununar í mun til skattagrundarlagið í kommununum.
6. Kommununar rinda árliga inn til veðhaldsgrunnin 1% av skattagrundarlagnum. Tá grunnurin er uppá 5% av restkuldini, kann inngjaldingin í grunnin minkast. Tær nærri reglurnar um grunnin kunnu fyrst gerast, tá samráðingarnar eru komnar longur áleiðis.
7. Tað er avgerandi, at allar kommununar luttaka í skipanini, bæði við inngjalding til veðhaldsgrunnin og við veðhaldi.

Endaliga avtalan skal góðkennast av kommununum og av landsstýrinum.

Roknað verður við, at umleggingin av lánunum kann geva kommununum árligar sparingar á rakstrinum til lánsgjøld uppá uml. 70 - 80 mió. kr. Sparingarnar í 1994 verða helst nakað minni, tí sparingarnar, sum kunnu gerast í ár, eru eisini tengdar at hvussu skjótt ein avtala

kann fáast við lánveitararnar.

Roknað verður við, at ein avtala kann fáast um ikki so langa tíð, møguliga innanfyri 1 - 2 mánaðir. Hetta skuldi havt við sær, at nakrar kommunur kunnu fáa javnvág á fíggjarætlanina fyri 1994 við einum lægri kommunuskattaprosenti. Skotið verður tí upp, at kommunurnar skulu hava møguleika í inntøkuárinum 1994 at lækka kommunuskattaprosentið.

Viðmerkingar til einstøku greinarnar.

Til § 1, nr. 1:
Eftir galdandi lóg, skal kommunuskattaprosentið verða ásett frammanundan inntøkuárinum, tað er galdandi fyri, sum galdandi fyri alt inntøkuárið. Eftir uppskotinum verður vikið frá hesum fyri hetta árið soleiðis, at kommunurnar kunnu ásetla nýtt kommunuskattaprosent fyri 1994 í inntøkuárinum.

Skattaprosentið kann ikki lækkast, fyrr enn avtalan við lánveitararnar er gjørd, ella tá tað er greitt, at ein avtala fæst og hvørjar treytirnar verða.

Treytin hjá hvørjari kommunu sær fyri at kommunuskattaprosentið kann lækkast er, at javnvág fæst á ársfíggjarætlanini, hóast skattaprosentið verður lækkað. Men kommunuskattaprosentið kann framvegis ikki setast lægri enn 16 og ikki hægri enn 23. Bendir endurskoðaða fíggjarætlanin á, har eisini lagt verður upp fyri rakstrinum higartil í ár, at einki avlop verður á rakstrinum í ár við verandi kommunuskattaprosenti, hóast minni útreiðslur til rentur og avdráttir av lánum, kann skattaprosentið ikki lækkast.

Av umsitingarligum ávum er neyðugt at hava eitt kommunuskattaprosent fyri alt inntøkuárið. Hetta hevur eftir tí kumulativu skattaskipanini við sær, at alt, sum er kravt ov nógv í kommunuskatti eftir tí hægra skattaprosentinum, verður útjavnað við næstu uppkrevjing, eftir tí lægra skattaprosentinum. Kommunur, sum lækka skattaprosentið, kunnu tí koma í ta støðu, at tær lítið ella einki fáa inn av kommunuskatti tann fyrsta mánaðin eftir at skattaprosentið er lækkað.

Til § 1, nr. 4:
Grunnurin verður veðhaldsgrunnur í staðin fyri kreppulánsgrunnur. Lán kann ikki veitast úr grunninum til vanligan rakstur ella íløgur.

Til § 1, nr. 5:
Av tí at tað er óvist, um allar kommunurnar vilja taka undir við ætlanini, er neyðugt, at landsstýrið fær heimild at seta hesar reglurnar í gildi, jbr. eisini § 2, stk. 2 og 3 í lógaruppskotinum. Hetta er eisini ynskt hjá "Kommunubólkinum" og Føroya Kommunufelag.

Veðhaldið er partvíst solidariskt, soleiðis at lánveitarin kann halda seg til hvørja kommunu hann vil, men bert innanfyri ta upphæddina, sum kommunan veðheldur við, nevniliga ein so stóran brotpart av samlaða veðhaldinum, sum kommunala skattagrundarlagið er av samlaða kommunala skattagrundarlagnum. Hinar kommunurnar skulu síðani endurrinda kommununi útleggið.

Til §1, nr. 6:
Eftir lógaruppskotinum verður lógin ikki longur tíðaravmarkað.

Til § 1, nr. 9:
Kommunulógávan er frá 1972, og eigur saman við hesi lógini, at verða endurskoðað, soleiðis, at betri samsvar verður millum lóggávuna og viðurskiftini, sum tey eru í dag. Serliga verður her hugsað um, at lóggávan verð gjørd við større kommunalum eindum fyri eyga, men tann samanleggingin av kommununum, sum man tá vónaði fór at fara fram, er ikki hend.

Til § 2:
Greinin heimilar landsstýrinum at seta reglurnar um veðhald og inngjald í veðhaldsgrunnir í 1996 og fylgjandi ár, í gildi, tá úrslitið av samráðingunum fyriliggur, og um ein kvalifiseraður meiriluti av kommununum ikki mótmælir tí.

1. viðgerð 21. apríl 1994. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 17. mai 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 15. apríl 1994 og eftir 1. viðgerð 21. apríl 1994 beint í fíggjarnevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin hildið fund við kommunubólkin, ið umboðar Føroya Kommunufelag og tær 7 størstu kommunurnar.

Á fundinum settu kommunuumboðini fram ynski um ymiskar broytingar í uppskoti landsstýrisins.

Nevndin hevur eisini hildið fund við Signar á Brúnni, landsstýrismann í kommunumáluni og við fulltrúan Sørin Pram Sørensen.

Á fundinum vóru landsstýrismaðurin og fulltrúin kunnaðir um tær broytingar, sum kommunubólkurin ynskir. Landsstýrismaðurin kundi taka undir við øllum broytingunum við undantak av, at í § 1, nr. 2 verður stk. 2 í § 1 a strikað.

Fíggjarnevndin er samd um at mæla løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við teimum broytingum, sum kommunubólkurin hevur ynskt, men er hetta kortini ikki galdandi viðvíkjandi stk. 2 í § 1 a.

Út frá hesum setir **ein samd nevnd** fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í uppskoti landsstýrisins verða gjørdar hesar broytingar:	I landsstyrets forslag foretages følgende ændringer:
1) Í § 1, nr. 3 (§ 9, stk. 1) verður	1) I § 1, nr. 3 (§ 9, stk. 1) ændres

ordingin "kommunalan veðhaldsgrunn" broytt til: "kommunalan láns- og veðhaldsgrunn" og (§ 9, stk. 5) " kommunala veðhaldsgrunnin" broytt til: "kommunala láns- og veðhaldsgrunnin".

2) Í § 1, nr. 4 (§ 9, stk. 7) verður aftan á ordini: "Grunnurin veitir" sett: "lán og".
3) Í § 1, nr. 5 (§ 9a, stk. 4) verður aftan á "kommunala" sett: "láns- og".
4) Í § 2, stk. 3, verður í staðin fyri "3/4" sett: "2/3".

"kommunal garantifond" til: "kommunal låne- og garantifond og (§ 9, stk. 5) "kommunal garantifond" til: "kommunal låne- og garantifond"

2) I § 1, nr. 4 (§ 9, stk. 7) udgår ordene: "Fonden stiller garanti" og i stedet indsættes: "Fonden yder lån til og stiller garanti".
3) I § 1, nr. 5 (§ 9a, stk. 4) indsættes efter "den kommunale": "låne- og".
4) I § 2, stk. 3, indsættes i stedet for "3/4": "2/3".

Frammanfyristandandi broytingaruppskot hevur kommunubólkurin sett fram á fundi við fíggjarnevndina.

Viðvíkjandi § 1, nr. 9 í uppskoti landsstýrisins, har mælt var til at seta nevnd at endurskoða hesa lógina og kommunuvallógina, ynskti kommunubólkurin at kommunurnar fáa umboð í slíka nevnd. Hetta helt landsstýrismaðurin vera sjálvsagt, og hesum tekur ein samd fíggjarnevnd undir við.

Í viðmerkingum landsstýrisins til § 1, nr. 5 verður sagt: "Av tí at tað er óvist, um allar kommunurnar vilja taka undir við ætlanini, er neyðugt, at landsstýrið fær heimild at seta hesar reglurnar í gildi, jbr. eisini § 2, stk. 2 og 3 í lógaruppskotinum. Hetta er eisini ynski hjá "Kommunubólkinum" og Føroya Kommunufelag.

Veðhaldið er partvíst solidariskt, soleiðis at láveitarin kann halda seg til hvørja kommunu, hann vil, men bert innanfyri ta upphæddina, sum kommunan veðheldur við, nevniliga ein so stóran brotpart av samlaða veðhaldinum, sum kommunala skattagrundarlagið er av samlaða kommunala skattagrundarlagnum. Hinar kommunurnar skulu síðani endurrinda kommununi útleggið."

Kommunubólkurin helt tað vera óheppið, at hesi orð verða standandi, og landsstýrismaðurin hevði einki ímóti, at hesi orðini verða strokin, og ein samd fíggjarnevnd tekur undir við, at so verður gjørt.

Viðvíkjandi § 1, nr. 2:
(§ 1 a, stk. 2) hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Heini O. Heinesen, Karl Heri Joensen) mælir til, at orðið "lækka" verður broytt til "broyta", og at hendta regla fær gildi fyri árini 1994 og 1995, og setir meirilutin fram soljóðandi

broytingaruppskot

§ 1, nr. 2, § 1a, stk. 2 verður soljóðandi:
"Eisini verður landsstýrinum heimilað at broyta kommunuskattaprosentið, um serlig viðurskifti eru, og landsstýrið metir, at grundarlag er fyri tí. Henda regla er galdandi fyri 1994 og 1995."

§ 1, nr. 2, § 1a, stk. 2, affattes således:
"Også får landsstyret hjemmel til at ændre kommuneskatteprocenten, såfremt særlige forhold gør sig gældende, og landsstyret vurderer, at der er grundlag herfor. Denne regel gælder i 1994 og 1995."

Minnilutin (Anfinn Kallsberg, Flemming Mikkelsen og Tordur J. Niclasen) kann ikki taka undir við, at landsstýrið verður heimilað at broyta tey kommunalu skattaprosentini og setir tí fram soljóðandi,

broytingar uppskot

Í § 1, nr. 2, verður í § 1 a, stk. 2, sett:
"Eisini verða kommunurnar við landsstýrisins góðkenning heimilaðar at broyta kommunuskattaprosentið, um serlig viðurskifti eru."

I § 1, nr. 2, indsættes i § 1 a, stk. 2:
"Også får kommunerne med landsstyrets godkendelse hjemmel at ændre kommuneskatteprocenten, hvis der særlige forhold."

Í aðru syftu tekur minnilutin undir við broytingaruppskoti meirilutans.

2. viðgerð 19. mai 1994. Uppskot landsstýrisins, broytt av meirilutanum í fíggjarnevndini, beint til 3. viðgerð við 31-0 atkvøðum. Minnilutauppskotið fall við 14-0 atkvøðum.

3. viðgerð 19. mai 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

FL jnr. 812-52/90.

Lóg nr. 85 frá 31. mai 1994.

199 Broyting í løgtingslóg um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning

Ár 1994, hósdagin 21. apríl legði Thomas Arabo, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 32 frá 27. mars 1992 um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning, sum broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 16. november 1992 og løgtingslóg nr. 44 frá 23. mars 1993 verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1 verða sum stk. 2 og stk. 3 sett:
"**Stk. 2.** Forvinningur sambært hesi lóg er avrokningin, sum maður fær fyri hvørja veiðiferð sær. Frítíðarløn verður ikki íroknað forvinningi.
Stk. 3. Inntøka sambært hesi lóg er forvinningur íroknað minstuløn, manningarstudning og møguligar aðrar almennar viðbøtur. Frítíðarløn verður ikki íroknað inntøkuni."

2) Sum nýggj § 6 verður sett:
"**§ 6.** Manning, sum mynstrar við føroyskum fiskiskipum, við teimum veiðihættum, sum eru nevndir niðanfyri, verður veitt dagstudningur fyri hvønn dag mynstrað er.
Stk. 2. Veiðihættirnir eru:
trolarar á feskfiskaveiðu,
saltfiskaskip á línuveiðu,
frystiskip á hemara- og svartkalvaveiðu v.m.,
verksmiðjutrolarar á svartkjaftaveiðu,
nótaskip,
ísnaðartrolarar,
verksmiðjutrolarar, sum salta ella frysta veiðuna umborð.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om mindsteløn, dagstøtte og mindsteindtægt.

§ 1.

I lagtingslov nr. 32 af 27. marts 1992 om mindsteløn, dagstøtte og mindsteindtægt, som ændret ved lagtingslov nr. 159 af 16. november 1992 og lagtingslov nr. 44 af 23. marts 1993 foretages følgende ændringer:

1) I § 1 indsættes som stk. 2 og stk. 3:
"**Stk. 2.** Forvinding efter denne lov er hver mands afregning for hver fisketur. Ferieløn indregnes ikke i forvindingen.
Stk. 3. Indtægt efter denne lov er forvinding indregnet mindsteløn, mandskabstøtte og eventuelle tillæg ydet af det offentlige. Ferieløn indregnes ikke i indtægten."

2) Som ny § 6 indsættes:
"**§ 6.** Til mandskab, påmønstret færøske fiskefartøjer, med de fangstmetoder der er nævnt nedenfor, udbetales der dagstøtte for hver påmønstret dag.
Stk. 2. Fangstmetoderne er:
forskfisketrawlere,
saltfiskeskib på linefiskeri,
fryseskibe på fiskeri efter sildehaj eller hellefisk m.m.,
fabrikstrawlere på fiskeri efter blåhvilling,
ringnotskibe,
industritrawlere,
fabrikstrawlere, som salter eller fryser fangsten ombord,
fryseskibe på fiskeri efter rejer eller skaldyr og skibe på fiskeri efter laks.

frystiskip á rækju ella skeljaveiðu og skip á laksaveiðu

Stk. 3. Dagsstudningurin er í mesta lagi munurin millum 8 vanligar tímalønir í sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag og 1/30 av mánaðarminstulønini. Dagstudningurin verður lækkaður eftir hesum reglum hvørja veiðiferð sær:

1) Fær fiskimaður minni enn 1.25 fiskipart, verður dagstudningurin lækkaður við 45 oyrum fyri hvørja krónu, sum inntøkan fyri hvønn dagin fer upp um 1/30 av galdandi mánaðarminstuløn.
2) Fær fiskimaður 1.25 fiskipart ella meira, verður dagstudningurin lækkaður við 45 oyrum av hvørjari krónu, sum inntøkan fyri hvønn dagin, frádrigin 25% av einum dagligum fiskiparti, fer upp um 1/30 av mánaðarminstulønini.

Stk. 4. Fyri manning, sum mynstrar við fiskiskipum, sum ikki koma undir § 6, stk. 2 og minstaforvinning, verður hetta galdandi: Er inntøkan fyri hvønn dag minni enn 8 vanligar tímalønir eftir tí í § 6, stk. 3 nevnda sáttmála, verður munurin goldin sum serlig viðbót. Serliga viðbótin verður lækkað eftir hesum reglum fyri hvørja veiðiferð sær:

1) Fær fiskimaður minni enn 1.25 fiskipart, verður serliga viðbótin lækkað við einari krónu fyri hvørja krónu, sum inntøkan fyri hvønn dagin fer upp um 1/30 av galdandi mánaðarminstuløn.
2) Fær fiskimaður 1.25 fiskipart ella meira, verður serliga viðbótin lækkað við einari krónu av hvørjari krónu sum inntøkan fyri hvønn dagin, frádrigin 25% av einum dagligum fiskiparti, fer upp um 1/30 av mánaðarminstulønini."

Stk. 3. Dagstøtten er maksimalt forskellen mellem 8 almindelige timelønninger efter overenskomsten mellem Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag og 1/30 af månedsminidstelønnen. Dagstøtten bliver aftrappet efter følgende regler, beregnet for hver fangstrejse:

1) Hvis en fisker får mindre end 1,25 fangstandel, aftrappes dagstøtten med 45 øre for hver krone, som indtægten pr. dag overstiger 1/30 af gældende månedsmindsteløn.
2) Hvis en fisker får end 1,25 fangstandel eller mere, aftrappes dagstøtten med 45 øre for hver krone, som indtægten pr. dag med fradrag af 25% af en daglig fangstandel, overstiger 1/30 af månedsmindstelønnen.

Stk. 4. For mandskab påmønstret fiskeskibe, som ikke er under § 6, stk. 2, og mindsteindtægt, gælder følgende regel: Hvis indtægten pr. dag er mindre end 8 timelønninger efter den i § 6, stk. 3 nævnte overenskomst, betales differencen som et særligt tilskud. Det særlige tilskud aftrappes efter disse regler, beregnet for hver fangstrejse:

1) Hvis en fisker får mindre end 1,25 fangstandel, aftrappes det særlige tilskud med en krone for hver krone, som indtægten pr. dag overstiger 1/30 af gældende månedsmindsteløn.
2) Hvis en fisker får 1,25 fangstandel eller mere, aftrappes det særlige tilskud med en krone for hver krone, som indtægt pr. dag med fradrag af 25% af en daglig fangstandel, overstiger 1/30 af månedsmindstelønnen."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Dagsstudningurin kom upprunaliga í staðin fyri manningarstudningin hjá feskfiskatrolarum. Í seinnu helvt av áttatiárunum, tá ofta var ringt at fáa manning til skipini, var henda skipan víðkað til at kalla allar veiðihættir, línuskip á feskfiskaveiði og útróðrarbátar tó undantiknir. Dagstudningurin er munurin millum mánaðarminstuløntna og 8 tímaløntir eftir sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Dagsstudningurin verður lækkaður eftir ávísum reglum.

Skipanin hevur verið umsitin á tann hátt, at lækkingin í dagsstudninginum hjá hvørjum manni umborð, sama hvør inntøkan hevur verið, hevur verið eftir einum fiskiparti. Til samanbering kann verða nevnt, at minstaløntin verður roknað út eftir inntøkuni, so at t.d. yvirmenn ikki fáa somu minstuløn sum dekkarar.

Broytingin í løgtingslóg um minstuløn o.a., sum her verður skotin upp, ásetir, at dagstudningurin skal roknast ymiskt alt eftir, hvussu nógvar partar fiskimaðurin fær. Fær fiskimaður minni enn 1,25 fiskipart, so verður bert fiskipartur, minstaløn, manningarstudningur og møguliga aðrar viðbøtur, tó ikki frítíðarløn, nýtt, tá lækkingin skal roknast. Fer inntøkan upp um 1/30 av mánaðarminstuløntini, so lækkar dagstudningurin við 45 oyrum fyri hvørja krónu, fiskiparturin fer upp um. Fær fiskimaðurin 1,25 fiskipart ella meira, verður dagliga inntøkan løgd til grund, tó so, at 25% av einum fiskiparti verða drigin frá inntøkuni, áðrenn lækkingin fer fram. Fer dagliga inntøkan, 25% av dagliga fiskipartinum frádrigin, upp um 1/30 part av mánaðarminstuløntini, lækkar dagstudningurin við 45 oyru fyri hvørja krónu farið verður upp um. Frítíðarløntin verður ikki roknað upp í inntøkuna.

Fyri línuskip og útróðrarfør, sum mynstra, er meginreglan hin sama, men lækkingin øðrvísi.

Lønjavningargrunnurin hevur mett við tølum fyri 1993 sum grund, at broytingin árliga hevði spart millum 6 og 7 mió. kr á konto 19873, inntøkutrygd hjá fiskimonnum (dagstudningur, minstaløn o.a.), á fíggjarlógini. Henda játtanin var í 1993 92,8 mill. kr. Útrokningin hjá Lønjavningargrunninum hevði ikki við, at 25% av fiskiparti verða drigin frá inntøkuni hjá teimum, sum fáa 1,25 part ella meira. Sparingin verður eisini minni enn roknað, tí skipanin ikki kann koma at galda fyri alt fíggjarárið 1994.

1. viðgerð 23. apríl 1994. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 4. mai 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 21. apríl 1994 og eftir 1. viðgerð 23. apríl 1994 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og førir fram, at um uppskot landsstýrisins verður samtykt í tí líki, tað er framlagt, fáa vit ein vinnu- og arbeiðsstaðg, sum fær ógvusligar avleiðingar fyri alt tað føroyska samfelagið. Tað er givið, at verður allur flotin lagdur, hevði hetta fingið so óbótaligan skaða, at landsins tíggjarlóg ikki fæst at hanga saman. Tí er fiskivinnunevndin samd um at seta fram semingsuppskot í hesum máli.

Síðani dagsstudningurin varð settur í gildi, er hann minkaður fleiri ferðir. Fyrst lækkaði hann við 22 oyrum fyri hvørja krónu, síðani varð lækkingin 28 oyru, so 40, og nú er lækkingin komin uppá 45 oyrut fyri hvørja krónu.

Við hesum eru stórar upphæddir spardar fyri landskassan, og fiskimenn hava fingið samsvarandi minni í úrtøku. Eisini er tann telefonviðbót, sum var um 3,5 mió. kr. í 1993, burtur í 1994.

Nevndin er samd um at mæla til at broyta uppskot landsstýrisins soleiðis, at 1,25 fiskipartur verður broyttur til 1,50 fiskipartur. Henda broyting gevur eina sparing uppá umleið 3,3 mió. kr. Eisini mælir nevndin til, at avtrappingin av dagsstudninginum verður eins fyri allar veiðibólkar. Í § 1, undir 1) í stk. 3, mælir nevndin til at strika setningin "og møguligar aðrar almennar viðbøtur". Í danska tekstinum í somu grein manglar setningurin "Ferieløn indregnes ikke i indtægten". Samlaða sparingin verður umleið 7 mió. kr.

Nevndin treytar sær, at løgtingssamtyktin 15. apríl 1994 í tingmálinum 17/1993: Broytingar í løgtingslóg um minstuløn, dagsstudning og minstaforvinning, fellur burtur.

Samsvarandi hesum setir **ein samd fiskivinnunevnd** fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) Í § 1 undir 1) í stk. 3. verður millum orðini "minstuløn, manningarstudning" "," strikað og "og" sett í staðin, og setningurin "og møguligar aðrar almennar viðbøtur" strikaður.
2) Eingin broyting í føroyska tekstinum.
3) Í § 1., undir 2) í stk. 2. verða orðini "saltfiskaskip á línuveiðu, frystiskip á hemara- og svart-

1) I § 1. under 1) i stk. 3. bliver mellem ordene "mindsteløn, mandskabsstøtte" "," slettet og "og" indsættes i stedet, og sætningen "og eventuelle tillæg ydet at det offentlige" slettes.
2) I § 1. under 1) stk. 3. tilføjes "Ferieløn indregnes ikke i indtægten".
3) I § 1., under 2) i stk. 2. ændres ordene "saltfiskeskib på lineli-

kalvaveiðu v.m.," broytt til "fest- og saltfiskaskip á línuveiðu, útróðrarfør, sum mynstra, frystiskip á hemara- og svartkalvaveiðu v.m.,".

4) Í § 1., undir 2) verður í stk. 3., undir 1) og 2) "1.25" broytt til "1,50".
5) Í § 1., undir 2) verður í stk. 3., undir 2) "25%" broytt til "50%".
6) Í § 1., undir 2), verður stk. 4. strikað.
7) Í § 2 verður skoytt uppí "Samstundis fer løgtingssamtyktin frá 15. apríl 1994 í løgtingsmáli nr. 17/1993: Broytingar í løgtingslóg um minstuløn, dagsstudning og minstaforvinning úr gildi."

skeri, fryseskibe på fiskeri efter sildehaj eller hellefisk m.m." til "fersk- og saltfiskeskib på linefiskeri, kystfiskefartøjer, som mønstrer, fryseskibe på fiskeri efter sildehaj eller hellefisk m.m.,".

4) I § 1., under 2) i stk. 3., under 1) og 2) ændres "1.25" til 1,50".
5) I § 1. under 2) i stk. 3., under 2) ændres "25%" til "50%".
6) I § 1., under 2) slettes stk. 4.
7) I § 2 tilføjes: "Samtidig ophæves lagtingsvedtagelsen af 15. april 1994 i lagtingssag nr. 17/1993: Ændringer i lagtingslov om mindsteløn, dagstøtte og mindsteindtægt."

2. viðgerð 9. mai 1994. Uppskot landsstýrisins broytt av meirilutanum í figgjarnevndini beint til 3. viðgerð við 31-0 atkvøðum.

3. viðgerð 11. mai 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 31-0 atkvøðum.

Lóg nr. 80 frá 25. mai 1994.

200 Broyting í løgtingslógunum um almennar og privatar skráir

Ár 1994, mikudagin 4. mai legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

I.

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skráir hjá almennum myndugleikum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 62 frá 5. juni 1984 um skráir hjá almennum myndugleikum við seinni broytingum, verður sett sum nýggj § 12 a:

"**§ 12 a.** Edv-skráir, sum koma undir reglurnar í hesi lóg, kunnu bara goymast og viðgerast í edv-kervum, sum eru í Føroyum uttan so, at landsstýrið gevur undantaksloyvi."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Edv-skráir, ið nú verða goymdar og viðgjørdar í edv-kervum uttan fyri Føroyar, skulu innan eina freist, sum landsstýrið ásetur, flytast til edv-kervi, sum er í Føroyum, ella niðurleggjast.

I.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om offentlige myndigheders registre.

§ 1.

I lagtingslov nr. 62 af 5. juni 1984 om offentlige myndigheders registre med senere ændringer indsættes som ny § 12 a:

"**§ 12 a.** Edb-registre, der henhører under bestemmelserne i denne lov, kan kun opbevares og behandles i edb-systemer, der forefindes på Færøerne, med mindre landsstyret giver undtagelsestilladelse."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Stk. 2. Edb-registre, der nu opbevares og behandles i edb-systemer uden for Færøerne, skal inden en af landsstyret fastsat frist overflyttes til edb-system, der forefindes på Færøerne eller nedlægges."

II.

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um privatar skráir v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 107 frá 15. november

II.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om private registre m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 107 af 15. november

1984 um privatar skráir v.m. verður § 9, stk. 1 orðað soleiðis:
"Elektronisk dataviðgjørdar skráir kunnu bara goymast og viðgerast í edv-kervum í Føroyum uttan so, at landsstýrið hevur givið undantaksloyvi og tá krøvini annars í hesi lóg eru lokin."
Stk. 1-4 verða hereftir stk. 2-5.

§ 2.
Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. Edv-førdar skráir, ið nú verða goymdar og viðgjørdar í kervum uttan fyri Føroyar, skulu innan eina freist, ið landsstýrið ásetur, flytast til edv-kervi í Føroyum ella niðurleggjast.

1984 om private registre m.v. affattes § 9, stk. 1 således:
"Elektronisk databehandlede registre kan kun opbevares og behandles i edb-systemer på Færøerne, medmindre landsstyret har meddelt undtagelsestilladelse og kravene iøvrigt efter denne lov er opfyldt."
Stk. 1-4 bliver herefter stk. 2-5.

§ 2.
Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.
Stk. 2. Edb-førte registre, der nu opbevares på systemer uden for Færøerne, skal inden en af landsstyret fastsat frist, flyttes til et edb-anlæg på Færøerne eller nedlægges.

Viðmerkingar:

Eftir galdandi lógum um privatar og almennar edv-skráir er eitt, sum forðar fyri, at skráirnar verða goymdar og viðgjørdar í edv-kervum uttan fyri Føroyar.

Hesin møguleikin ger tað torført ella ógjørligt at hava nóg gott eftirlit við tílíkum skráum.

Landsstýrið skjýtur tí upp fyri at økja um trygdina, at edv-skráir, ið koma undir lógirnar, skulu goymast og viðgerast í edv-kervum í Føroyum.

1. viðgerð 9. mai 1994. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 19. mai 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 4. mai 1994 og eftir 1. viðgerð 9. mai 1994 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Helena Dam á Neystabø, Hans Pauli Olsen og Mikkjal Sørensen) mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Lisbeth L. Petersen) metir málið vera av stórum týdningi, og sundir eiga ti

at vera til bæði neyva viðgerð og kanningar.

Stundir áttu verið fyrst at kanna, um verandi lóggáva verður hildin, síðan at kanna, um ikki aðrar leiðir kunnu gangast, t.d. um neyðugt, so at avmarka nýtsluna av p-talinum, sum harvið kundi forða fyri flutningi av skráum á edv-økinum. Eisini átti at verið kannað, um lóggáva av slíkum slagi sum hesum samsvarar við lóggávu í londum, sum vit hava samband og samstarv við.

Málið ber bráð av at vera gjørt í skundi, og at lóggivið verður, uttan at greiða er fingin á, hvørjar avleiðingar, slík avgerð kann fáa. Minnilutin (Lisbeth L. Petersen) tekur tí ikki undir við uppskotinum, sum støðan er í løtuni.

Ein annar minniluti (Birgir Danielsen) hevur hesar viðmerkingar:

Víða um í Europa í smærri eins og í størri londum er ikki óvanligt, at t.d. peningastovnarnir, har trygdin hevur størsta týdning, hava sítt egna edv, sum er afturlatið. Skipanirnar verða úrvegaðar frá størri spesialiseraðum leverandørum, meðan koyringin á skipanini fer fram desentralt.

Í Danmark er hetta ikki so. Har fer koyringin fyri t.d. bankarnar fram á trimum edv-centralum, og tað er ikki óhugsandi, at hesir innan stutta tíð hava ávíst tætt samstarv (opið kervi).

Við støði í hesum og við støði í grundgevingini fyri hesi lóg verður mett, at hetta lógaruppskotið ikki striðir ímóti kanningarreglum (hugsað verður ES, Gatt v.m.)

Neyðugt er at umsita undantaksreglurnar reiðiliga liberalt. Dataviðgerðin av skráunum uttanlands, har trygdin ætlast at vera í lagi og sambært lóg 107/84 og lóg 62/84 við broyting sambært hesi lóg, metist ikki á nakran hátt at vera til bága fyri edv-menningina - tvørturímóti, tá hvussu so er upp á styttri sikt. Tungtvigandi er, at okkara bygnað menniskjaliga tilfeingi fær høvi til at arbeiða við edv-loysnum, og at okkara menning fer fram á ein slíkan hátt, at vit verða kappingarfør á hesum økinum í framtíðini, eisini innan aðrar møguligar framtíðar vinnugreinir.

Tað er í hesum høpi avgerandi, at skipað verður so fyri, at føroyskt vinnulív ikki á nakran hátt í framtíðini verður avbyrgt frá umheiminum, tí eiga okkara lógir um edv-skráir at verða endurskoðaðar javnan, fyri at vit tryggja okkum, at tær eru í samljóð við tíðarinnar krøv.

Tryggasti máti at náa hesum endamáli er, at vit hava fólk við fjølbroyttum edv-kunnleika og edv-mentan.

Onkur kann kanska halda, at henda lógin vil geva ávísum edv-stovni eina monopolstøðu mótvegis t.d. peningastovnunum.

Hin vegin verður hendan lógin ikki samtykt, er vandi fyri, at útlendskur edv-stovnur fær samsvarandi monopolstøðu. Tí kann man spyrja, hvør verður munurin í so máta.

Tann føroyska loysnin hevur so tann fyrimun, at kundarnir sjálvir eiga og hava leiðsluna av

egnum edv-stovni og hava sostatt munandi ávirkan á menningina og á kostnadin, og kann minnilutin (Birgir Danielsen) tí taka undir við málinum.

2. viðgerð 19. mai 1994. Málið samtykt við 25-0 atkvøðum.

3. viðgerð 19. mai 1994. Uppskot landsstýrisins endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

Lóg nr. 86 frá 15. juni 1994 og nr. 87 frá 30. mai 1994.

201 Ognan av føstum eigindómi

Ár 1994, mikudagin 4. mai legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um ognan av føstum eigindómi.

§ 1. Fólk, sum ikki búgva í Føroyum, og sum heldur ikki fyrr hava búð í Føroyum í minsta lagi í 5 ár tilsamans, kunnu bert við landsstýrisins loyvi í hvørjum einstøkum føri ogna sær fastan eigindóm í Føroyum.
Stk. 2. Tað sama er galdandi fyri felǿg, stovnar o.a.m., sum ikki hava heimstað í Føroyum, og útlendskar myndugleikar.
Stk. 3. Stk. 1 er ikki galdandi fyri danskar ríkisborgarar, sum búgva í Føroyum.

§ 2. Loyvi landsstýrisins krevst ikki til at ognast fastan eigindóm, sum er arvaður, yvirtikin til at sita í óskiftum búgvi við ella fingin við býti av felagsbúgvi.

§ 3. Loyvir eftir § 1 kunnu treytast og

lagtingslov om erhvervelse af fast ejendom.

§ 1. Personer, som ikke har bopæl på Færøerne, og som heller ikke tidligere har havt fast bopæl på Færøerne i mindst 5 år ialt, kan kun med landsstyrets tilladelse i hvert enkelt tilfælde erhverve fast ejendom på Færøerne.
Stk. 2. Det samme gælder selskaber, foreninger, institutioner o.lign., som ikke har hjemsted på Færøerne, samt udenlandske offentlige myndigheder.
Stk. 3. Stk. 1 gælder ikke for danske statsborgere bosat på Færøerne.

§ 2. Landsstyrets tilladelse er uformøden ved erhvervelse af fast ejendom ved arv, ved overtagelse til hensidden i uskiftet bo eller ved deling af fællesbo.

§ 3. Tilladelser efter § 1 kan gøres be-

verða givin fyri eitt ávíst áramál.

§ 4. Við fráboðan til tinglýsing av føstum eigindómi eftir § 1 skal ognarin, um so er at hann er útlendskur ríkisborgari ella felag v.m., ið ikki er heimahoyrandi í Føroyum, vísa fram loyvi frá landsstýrinum til at ognast nevnda eigindóm. Fyriliggur eingi loyvi frá landsstýrinum, gevur sorinskrivarin tilmeldaranum freist eftir reglunum í § 15 í tinglýsingarlógini til at útvega tørvandi loyvi.

§ 5. Avtalur um nýtslu ella leigu av føstum eigindómi í eitt longri áramál, ið verða mettar at vera gjørdar við tí endamáli at sleppa undan reglunum í hesi lóg, eru ógildugar.
Stk. 2. Aðrar rættargerðir fyri at royna at sleppa undan lógarreglunum, koma undir reglurnar í stk. 1.

§ 6. Hava teir í § 1 nevndu persónar ella feløg v.m. ognað sær fastan eigindóm uttan landsstýrisins loyvi, hava teir skyldu til at avhenda hendan innan eina freist, ið landsstýrið ásetur.

§ 7. Brot á reglurnar í §§ 1, 4 og 6 verða revsað við bót.

§ 8. Landsstýrið kann í kunngerð áseta nærri reglur um umsitingina av hesi lóg.

§ 9. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. Lógin er ikki galdandi fyri eigindómar, ið avtalur eru gjørdar um ella sum pant er fingið í áðrenn henda lóg fær gildi, um ognarheimildin ella pantið verður fráboðað til tinglýsing innan 1 mánað aftaná, at henda lóg fær gildi.

tingede og gives for et bestemt åremål.

§ 4. Ved anmeldelse til tinglysning af fast ejendom efter § 1 skal erhververen, såfremt han er udenlandsk statsborger eller selskab m.v., som ikke er hjemmehørende på Færøerne, forevise tilladelse fra landsstyret til at erhverve ejendommen. Forefindes ingen tilladelse fra landsstyret, giver sorenskriveren tilmelderen en frist i overensstemmelse med reglerne i § 15 i tinglysningsloven til at fremskaffe den nødvendige tilladelse.

§ 5. Aftaler om langvarige brugs- eller lejeforhold vedrørende fast ejendom, der må antages at være indgået med det formål at omgå de i denne lov indeholdte regler, er ugyldige.
Stk. 2. På andre retshandler, hvorved lovens bestemmelser søges omgået, finder reglerne i § 1 anvendelse.

§ 6. Har de i § 1 nævnte personer eller selskaber m.v. erhvervet fast ejendom uden landsstyrets tilladelse, skal ejendommen afhændes inden en frist, som landsstyret sætter.

§ 7. Overtrædelse af §§ 1, 4 og 6 straffes med bøde.

§ 8. Landsstyret kan ved bekendtgørelse fastsætte nærmere regler om administrationen af denne lov.

§ 9. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.
Stk. 2. Loven gælder ikke for ejendom, om hvilken der er indgået aftale eller i hvilken der er fået pant inden lovens ikrafttræden, hvis erhvervelsen eller pantsættelsen er anmeldt til tinglysning inden 1 måned efter, at denne lov er trådt i kraft.

Viðmerkingar:

Eftir tinglýsingarlógini er einki krav um, at ein fyri at kunna tinglýsast sum eigari av eigindómi í Føroyum, hevur bústað í Føroyum ella er danskur ríkisborgari.

Heldur ikki er tað nakað krav um, at feløg skulu hava heimstað í Føroyum, fyri at kunna gerast eigari av fastari ogn í Føroyum.

Eingin uppgerð finst um útlendingar ella útlendsk feløg eiga nøgvar fastar ognir í Føroyum, men mett verður, at tað higartil ikki hevur verið stórur áhugi hjá útlendingum at ogna sær fastan eigindóm í Føroyum. Hugsast kann tó, nú botnurin er við at fara undan marknaðinum fyri fastari ogn í Føroyum og útboðið er ógvuliga stórt, at útlendingar fara at spekulera í fastari ogn í Føroyum.

Fyri at kunna byrgja fyri møguligari óheldugari gongd á húsamarknaðinum vegna serliga ringu búskaparligu støðuna í Føroyum í løtuni, skjýtur landsstýrið upp, at loyvi skal krevjast hjá persónum, sum ikki hava búð eina ávísa tíð í Føroyum, og hjá feløgum, sum ikki hava heimstað í Føroyum, at ogna sær fastan eigindóm í Føroyum.

1. viðgerð 11. mai 1994. Málið varð heint í rættarnevndina. Burturdottið vegna samgonguslit.

202 Útskriving av nývali

Ár 1994, mikudagin 11. mai legði Edmund Joensen, løgtingsmaður, vegna sambandsflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

1) **Vísandi til § 9 í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum samtykkir løgtingið, at løgtingið verður upployst.**

2) **Álagt verður løgmanni at útskriva val skjótast gjørligt.**

Viðmerkingar

Ásannandi, at sitandi samgonga ikki longur hevur parlamentariskan meiriluta á løgtingi, skjýtur sambandsflokkurin upp, at løgtingið verður upployst, og at løgmaður útskrivar nýval skjótast gjørligt.

1. viðgerð 17. mai 1994. Málið varð beint í rættarnevndina. sum 19. mai 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av sambandsflokkinum tann 17. mai 1994 og eftir 1. viðgerð 17. mai 1994 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í fimm minnilutar.

Ein minniluti (Helena Dam á Neystabø) hevur hesar viðmerkingar:

Ásannandi tá støðu, sum er á Føroya løgtingi, og at samgongan hevur mist sín meiriluta, vil sjálvstýrisflokkurin taka undir við at heita á løgmann um at skriva út løgtingsval sum skjótast.

Tað er rímiligt, at Føroya fólk nú fær høvi at velja síni umboð, sum skulu leggja framtíðarpolitikkin til rættis, ikki minst samráðingarnar við danir, sum kunnu verða avgerandi fyri lagnu Føroya sum tjóð.

Ein annar minniluti (Heini Johansen) ásannar, at umrøðan undir 1. viðgerð av hesum máli gav týðiliga ábending um, at ein meiriluti í løgtinginum tekur undir við, at nýval verður útskrivað skjótast gjørligt, og tað merkir, at val kann verða longu í tí fyrstu vikuni í juli mánaða.

Minnilutin harmast um, at valið, sum annars skuldi verða í november, verður so nógv framskundað, og at tað verður útskrivað við so stuttari freist,ið talan er um. Tað stutta skotbráðið ger, at okkara langfarafiskimenn ongan møguleika fáa fyri at greiða atkvøðu, og at aðrir veljarar, orsakað av summarfrítíðini, ikki verða heima, tá valið verður hildið, og tí heldur ikki greiða atkvøðu.

Í løtuni liggja eini 35 til 40 mál í løgtinginum og/ella í ymiskum løgtingsnevndum. Millum hesi eru fleiri týðandi mál, ið hava skund, sum tískil ikki tola at bíða. Eitt av hesum málum er uppskotið til nýggja stýrisskipanarlóg. Nevndarviðgerðirnar hava givið týðiligar ábendingar um, at í tinginum er stórur meiriluti fyri fleiri av hesum málum, ið sostatt kundi verið samtykt og avgreidd, um løgtingið slapp at arbeiða eina tíð afturat.

Síðan 6. oktober í 1992, hava fleiri samráðingarumfør verið millum donsku stjórnina og landsstýrið. Umfíggingin av føroysku uttanlandsskuldini stendur frammaliga í hesum samráðingum. Eitt ógvuliga týdningarmikið samráðingarumfar í hesi røð av samráðingum verður 17. august í ár. Eitt løgtingsval í juli kann føra til, at engin samgonga er skipað, og at einki landsstýri er valt, tá hesar samráðingar verða, við tí úrslitið, at tað verða em-

hætismenn, ið koma at sita føroysku megin samráðingarborðið.

Tað, at fleiri týðandi løgtingsmál fella burtur, saman við vandanum fyri, at føroyskir embætismenn koma at sita við samráðingarborðið 17. august, setir okkum í eina sera trupla politiska støðu. Minnilutin er samdur í, at løgtingsvalið, sum vanliga hevur verið hildið í november, eigur at verða framskundað einar tveir mánaðar. Orsøkin til hesa støðu minnilutans er, at tá hevði rúmari tíð verið hjá einum nýggjum løgtingi at viðgjørt fíggjarlógaruppskotið, ið skal verða avgreitt áðrenn árslok.

Orsøkin til ta sera truplu støðuna, sum vit nú eru í, er eitt taktiskt politiskt spæl frá sjálvstýrisflokkinum og serstakliga frá formanninum í tingbólkinum hjá hesum flokki. Hendingarnar teir seinastu dagarnar hava avdúkað, at sjálvstýrisflokkurin á tingi undir verandi leiðslu, ikki er at líta á í politiskum samstarvi.

Tá 2. viðgerð av løgtingsmáli nr. 65: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, stóð á skránni til løgtingsfundin 9. mai, fekk javnaðarflokkurin áheitan frá sjálvstýrisflokkinum um at skjóta upp, at málið, ið var framlagt av skattanevndini, har Lasse Klein úr sjalvstýrisflokkinum er formaður, varð beint í fíggjarnevndina til nærri kanningar og víðari viðgerð.

Tá javnaðarflokkurin ikki vildi gera eftir hesi áheitan, varð uppskot um at beina málið í fíggjarnevndina sett fram av einum av løgtingsumboðunum hjá sjálvstýrisflokkinum. Men tað taktiska politiska spælið, sum lá aftanfyri hesa royndina, hevði ikki cydnuna við sær. Løgtingsformaðurin, sum eisini er valdur á ting fyri sjálvstýristlokkin, er heldur ikki heilt ciðasørur, tá tað kemur til taktiskt politiskt spæl. Hann gjørdist sigurharrin.

Men formaður sjálvstýrisfloksins á tingi gavst ikki so. Tá løgtingsmál nr. 65 kom til atkvøðugreiðslu við 2. viðgerð, fekk javnaðarflokkurin greið boð frá formanninum í tingbólki sjálvstýrisfloksins. Í hesum boðum varð sagt, at um nakar úr javnaðarflokkinum atkvøddi fyri nøkrum parti av løgtingsmáli nr. 65, so varð samgongan fokin. Javnaðarflokkurin stóð saman við restini av samgonguni. Hetta varð gjørt fyri at tryggja tann politiska stabilitetin.

Øll uppskotini í løgtingsmáli nr. 65 vórðu felld. Eftir hetta boðaði formaðurin í skattanevndini frá, at hann hevði tikið seg úr tingbólki sjálvstýrisfloksins, og at hann somuleiðis hevði tikið sín stuðul til samgonguna aftur. Aftaná hetta gjørdi restin av samgonguni av tann 11. mai, at hon skuldi halda fram soleiðis, at tey týdningarmiklu málini, sum liggja í løgtinginum og í ymiskum løgtingsnevndum kundu verða avgreidd, og soleiðis at landsstýrið kundi fáa tær tydningarmiklu samráðingarnar við donsku stjórnina frá hondini. Semja var um at ásetta ein valdag millum 15. september og 1. oktober.

Men tað taktiska politiska spælið hjá formanninum í tingbólki sjálvstýrisfloksins var ikki lokið við hesum. Nú skuldi tann eftirverandi samgongan syrgja fyri at fáa løgtingsformannin frá. Uppskot um hetta varð felt í løgtinginum og nú var so eitt hvørt annað til ráða at taka. Á fundi millum landsstýrið og umboð fyri samgonguflokkarnar á tingi tann 17. mai, fingu javnaðarflokkurin og tjóðveldisflokkurin at vita, at sjálvstýrisflokkurin nú vildi hava val skjótast gjørligt, og at orsøkin til hesa kúvending var, at síðani samgongan misti meirilutan á tingi, var alt tað politiska arbeiðið merkt av taktiskum politiskum spæli.

Minnilutin kann taka undir við, at tað í stóran mun er talan um taktiskt politiskt spæl, sum fyrstu ferð kom aiment til sjóndar, tá sjálvstýrisflokkurin í tíðarskeiðinum frá 9. til 11. mai slapp sær av við tann løgtingsmann hjá flokkinum, sum hevur sitið longst á tingi, og tá tað ikki ber til at fáa ein meiriluta í løgtinginum at atkvøða fyri, at nýval av formansskapi verður sett á dagsskránna, soleiðis at formaðurin í sjálvstýrisflokkinum kann sleppa av við Lassa Klein sum løgtingsformann, so er nýval til løgtingið einasta loysnin hjá formanninum í tingbólki sjálvstýrisfloksins.

Minnilutin er samtørdur um, at orsøkin til alt tað taktiska poltiska spælið í hesum døgum, eru innanhýsis trupulleikar í sjálvstýrisflokkinum. Hesir innanhýsis trupuleikar í einum ávísum flokki eru nú orsøkin til, at alt politiskt arbeiði verður lagt lamið við tí úrslitið, at fleiri týðandi løgtingsmál detta burtur, at langfarafiskimenn ikki fáa gjørt nýtslu av teirra demokratiska rætti, og at samráðingarnar við donsku stjórnina 17. august helst verða førdar av føroyskum embætismonnum.

Í fyrstu syftu mælir minnilutin til, at løgtingsarbeiðið heldur fram, og at løgtingsvalið verður hildið ein av døgunum millum 15. september og 1. oktober. Í aðru syftu tekur minnilutin undir við uppskoti sambandsfloksins í løgtingsmáli nr. 202.

Hin triði minnilutin (Hans Pausen Olsen) tekur støðu í tingsalinum.

Hin fjórði minnilutin (Birgir Danielsen) tekur undir við uppskoti sambandsfloksins.

Fimti minnilutin (Lisbeth L. Petersen) tekur undir við uppskoti sambandsfloksins vísandi til viðmerkingarnar.

19. mai 1994 setti Heini Johansen fram soljóðandi:

Vísandi til viðmerkingarnar í álitinum til løgtingsmál nr. 202: Útskriving av nývali, setir **minnilutin Heini Johansen** fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

"Løgtingið áleggur løgmanni at útskriva nýval til løgtingið ein av døgunum millum 15. september og 1. oktober 1994".

2. viðgerð 19. mai 1994. Uppskot minnilutans fall við 13-0 atkvøðum. Uppskot sambandsfloksins samtykt við 29-2 atkvøðum.

203 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing

Ikki framlagt

204 Samráðingar við donsku stjórnina

Ikki framlagt

205 Áseting av skatti til landskassan

Ikki framlagt

206 Viðvíkjandi støðu teirra arbeiðsleysu

Ikki framlagt

Onnur tingseta 1993

207 Løgtingslóg um stýrisskipan Føroya (190/93)

Ár 1994, mikudagin 20. juli legði løgmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um stýrisskipan Føroya.

lagtingslov om Færøernes styrelsesordning.

Inngangur

§ 1. Í yvirtiknum málum er lóggávuvaldið hjá løgtinginum og løgmanni í felag. Útinnandi valdið er hjá landsstýrinum. Dómsvaldið er hjá dómsstólunum.

Lóggávuvaldið

§ 2. Løgtingið er ting við í mesta lagi 33 tingmonnum.

§ 3. Valrætt til løgtingið hevur hvør, ið fylt hevur 18 ár, hevur danskan heimarætt og er heimahoyrandi í Føroyum, uttan so er, at hann er gjørdur ómyndugur.

§ 4. Valbærur er hvør, sum hevur valrætt til løgtingið, uttan so er, at hann er revsaður fyri gerð, sum hevur við sær, at hann eftir almannahugsan ikki er verdugur at sita á tingi.
Stk. 2. Tann, ið dømdur er fyri revsiverda gerð, verður ikki óverdugur til tingsess.

Indledning

§ 1. Den lovgivende magt i overtagne anliggender er hos lagtinget og lagmanden i forening. Den udøvende magt er hos landsstyret. Den dømmende magt er hos domstolene.

Den lovgivende magt

§ 2. Lagtinget udgør een forsamling bestående af højst 33 medlemmer.

§ 3. Valgret til lagtinget har enhver, der er fyldt 18 år, har dansk indfødsret og er hjemmehørende på Færøerne, medmindre vedkommende er umyndiggjort.

§ 4. Valgbar er enhver, som har valgret til lagtinget, medmindre vedkommende er straffet for en handling, der i almindeligt omdømme gør ham uværdig til at være medlem af lagtinget.
Stk. 2. Den, der er dømt for en strafbar handling, er ikke uværdig til lagtings-

uttan so, at hann fær fongsulsdóm í 4 mánaðir ella longri, ella trygdarvarðhaldsdóm.
Stk. 3. Heldur ikki er hann óverdugur, tá ið 5 ár eru liðin frá tí, at revsingin er avsitin, tyrnd, ella eftirgivin ella frá endaligari leysgeving úr trygdarvarðhaldi.

mandat, med mindre domfældte er idømt straf af fængsel i 4 måneder eller derover eller forvaring.
Stk. 3. Ej heller er den dømte uværdig, når der er forløbet 5 år fra straffens udståelse, forældelse eller eftergivelse eller fra den endelige løsladelse fra forvaring.

§ 5. Løgtingið verður valt á almennum, loyniligum og beinleiðis vali.
Stk. 2. Nærri reglur um at inna valrættin verða givnar í løgtingsvallógini, herumpti at áseta løgtingsmannatalið innan fyri tað hámark, ið ásett er í § 2.

§ 5. Lagtinget vælges ved almindelige, hemmelige og direkte valg.
Stk. 2. De nærmere regler for valgrettens udførelse gives ved lagtingsvalgloven, herunder at fastsætte antallet af lagtingsmedlemmer indenfor det i § 2 fastsatte højeste antal.

§ 6. Løgtingsmenn verða valdir fyri fýra ár í senn.
Stk. 2. Løgtingið eins væl og løgmaður kunnu, nær ið vera skal, skriva út nýval, sum hevur við sær, at tey løgtingsumboð, ið verið hava, falla burtur, tá ið nývalda løgtingið er sett.
Stk. 3. Tað áliggur løgmanni at skipa so fyri, at nýval verður hildið, áðrenn valskeiðið er runnið.
Stk. 4. Løgtingsmaður, sum missir valbæri sítt, fer úr tingsessinum.

§ 6. Lagtingets medlemmer vælges for fire år.
Stk. 2. Såvel lagtinget som lagmanden kan til enhver tid udskrive nyvalg med den virkning, at de bestående lagtingsmandater bortfalder, når det nyvalgte lagting er sat.
Stk. 3. Det påhviler lagmanden at foranledige, at nyvalg afholdes inden valgperiodens udløb.
Stk. 4. Mister et medlem af lagtinget sin valgbarhed, bortfalder dennes mandat.

§ 7. Løgtingið ger sjálvt av, um val tingmanna hevur gildi, og spurningir um, hvørt tingmaður hevur mist valbæri sítt.

§ 7. Lagtinget afgør selv gyldigheden af sine medlemmers valg samt spørgsmål om, hvorvidt et medlem har mistet sin valgbarhed.

§ 8. Tá ið góðkent er, at løgtingsmaður er valdur, skal hann leggja frá sær øll álitisstørv í nevndum, ráðum o.t., sum eru undir eftirliti landsstýrisins ella, sum landsstýrið hevur skipað hann í, tó undantikin beinleiðis fólkavald umboð.

§ 8. Når valget af et lagtingsmedlem er godkendt, skal medlemmet nedlægge alle hverv i nævn, råd o.l., som er under tilsyn af landsstyret eller, hvor medlemmet er beskikket til hvervet af landsstyret, dog med undtagelse af direkte folkevalgte repræsentanter.

§ 9. Nývalda løgtingið kemur saman til fundar kl. 10.00 tólvta yrkadag eftir valdagin, uttan so er, at løgmaður ikki longu hevur boðað til fundar.
Stk. 2. Tá ið valbrøvini eru góðkend, verður løgtingið sett, og valdir verða løg-

§ 9. Det nyvalgte lagting træder sammen kl. 10.00 den tolvte søgnedag efter valgdagen, dersom lagmanden ikke har indkaldt det til møde forinden.
Stk. 2. Straks efter prøvelsen af mandaterne sættes lagtinget ved valg af lagtings-

tingsformaður og næstformenn.
Stk. 3. Løgtingsformaður og næstformenn sita alt valskeiðið uttan so er, at teir sjálvbodnir leggja frá sær ella fýra fimtingar av øllum tingmonnum skrivliga krevja nýval av formansskapi.

§ 10. Løgtingssetan byrjar ólavsøkudag og heldur á til ólavsøkudag árið eftir.
Stk. 2. Ólavsøkudag ganga løgtingsformaður, løgtingsmenn, løgmaður, landsstýrismenn og embætismenn skrúðgongu úr tinginum í dómkirkjuna, har gudstænasta verður haldin, og síðan aftur í tingið. Løgtingsformaðurin ger av, hvørjir embætismenn eru við í skrúðgonguni, og hvussu gongan er skipað.
Stk. 3. Løgtingið verður sett aftur ólavsøkudag kl. 13.00.

§ 11. Samkomustaður løgtingsins er Tórshavn. Í serstøkum føri kann løgtingið tó koma saman til fundar á øðrum staði í landinum.

§ 12. Á ólavsøkutúndinum greiðir løgmaður frá støðu landsins og tí, ið landsstýrið hevur í ætlan at fremja.
Stk. 2. Við støði í røðu løgmans tekur tingið innan 6 yrkadagar støðu landsins til umrøðu.

§ 13. Løgtingsformaðurin boðar til løgtingsfundar og kunnger samstundis dagsskrá. Formaðurin hevur skyldu til at boða til fundar uttan óneyðuga dvøl, um so er, at í minsta lagi tveir fimtingar av tingmonnum ella løgmaður skrivliga biðja um tingfund við dagsskrá.

§ 14. Løgmaður, landsstýrismenn og ríkisumboðsmaður hava embætis vegna, uttan atkvøðurætt, atgongd at løgtinginum, og hava rætt til á fundum at krevja at koma til orðanna, men skulu annars halda tingskipanina.

formand og næstformænd.
Stk. 3. Lagtingsformanden og næstformændene er valgt for hele valgperioden medmindre de nedlægger deres hverv eller fire femtedele af alle lagtingsmedlemmerne skriftlig kræver nyvalg af formandsskabet.

§ 10. Lagtingsåret begynder Olajdag og varer til Olajdag det følgende år.
Stk. 2. Olajdag går lagtingsformanden, lagtingsmænd, lagmanden, medlemmer af landsstyret og embedsmænd i procession fra lagtinget til og fra domkirken, hvor der afholdes gudstjeneste. Lagtingsformanden fastsætter, hvilke embedsmænd der deltager i processionen, og i hvilken orden, der bliver gået.
Stk. 3. Lagtinget sættes påny Olajdag kl. 13.00.

§ 11. Lagtinget træder sammen i Tórshavn. I overordentlige tilfælde kan lagtinget dog samles andetsteds på Færøerne.

§ 12. På Olajmødet afgiver lagmanden en redegørelse for landets almindelige stilling og de af landsstyret påtænkte foranstaltninger.
Stk. 2. På grundlag af den af lagmanden afgivne redegørelse finder inden 6 søgnedage en almindelig forhandling sted.

§ 13. Lagtingsformanden indkalder lagtinget til møde med angivelse af dagsorden. Det påhviler formanden at indkalde til møde uden ugrundet ophold, når mindst to femtedele af lagtingets medlemmer eller lagmanden skriftlig fremsætter begæring herom med angivelse af dagsorden.

§ 14. Lagmanden, landsstyresmedlemmerne og rigsombudsmanden har i embeds medfør, uden stemmeret, adgang til lagtinget, og er berettigede til under forhandlingerne at forlange ordet, idet de iøvrigt iagttager forretningsordenen.

§ **15.** Løgmanni, landsstýrismonnum og løgtingsmonnum eru heimilað at seta fram uppskot til løgtingslógir, ríkislógartilmæli og aðrar samtyktir.
Stk. 2. Uppskot til løgtingslóg ella ríkislógartilmæli kann ikki verða endaliga samtykt, uttan at tað hevur fingið tríggjar viðgerðir á løgtingi.
Stk. 3. Um nýval verður, ella tá ið løgtingsseta er lokin, falla burtur øll tey uppskot til løgtingslógir, ríkislógartilmæli og aðrar samtyktir, sum ikki frammanundan eru endaliga samtykt.

§ **15.** Lagmanden og de øvrige medlemmer af landsstyret samt ethvert medlem af lagtinget er berettiget til at fremsætte forslag til lagtingslove, beslutninger vedrørende rigslovgivning og andre beslutninger.
Stk. 2. Et lagtingslovsforslag eller forslag til beslutning vedrørende rigslovgivning kan ikke endelig vedtages, forinden det tre gange har været behandlet i lagtinget.
Stk. 3. Ved nyvalg, og ved lagtingsårets udgang, bortfalder alle forslag til lagtingslove, beslutninger vedrørende rigslovgivning og andre beslutninger, der ikke forinden er endelig vedtaget.

§ **16.** Løgtingið sjálvt ásetur tingskipan sína, sum inniheldur nærri reglur um málsgongd og skilhald.

§ **16.** Lagtinget fastsætter selv sin forretningsorden, der indeholder de nærmere bestemmelser vedrørende forretningsgang og ordens opretholdelse.

§ **17.** Løgtingsfundir eru almennir. Útvarpi og sjónvarpi er frítt at senda beinleiðis av fundunum. Løgtingið kann tó í einstøkum førum samtykkja viðgerð aftan stongdar dyr.

§ **17.** Lagtingets møder er offentlige. Radio og fjernsyn er berettiget til at transmittere direkte fra møderne. Lagtinget kan dog i enkelte tilfælde beslutte, at en sag skal behandles for lukkede døre.

§ **18.** Løgtingið kann ikki taka avgerð um mál, uttan at meira enn helmingur av tingmonnum er á fundi.
Stk. 2. Løgtingsmál er samtykt, tá ið fleiri atkvøður eru fyri enn ímóti, um ikki annað er ásett í hesi løgtingslóg.

§ **18.** Lagtinget kan kun tage beslutning, når over halvdelen af medlemmerne er tilstede.
Stk. 2. Forslag i lagtinget er vedtaget, når der er flere stemmer for end mod forslaget, såfremt ikke andet er fastsat i denne lagtingslov.

§ **19.** Løgtingið kann skipa nevndir av tingmonnum at kanna alment umvarðandi mál. Nevndirnar hava rætt at krevja skrivligar ella munnligar upplýsingar frá einskildum borgarum eins væl og frá almennum embætismonnum.

§ **19.** Lagtinget kan nedsætte kommissioner af sine medlemmer til at undersøge almenvigtige sager. Kommissionerne er berettigede til at fordre skriftlige eller mundtlige oplysninger såvel af private borgere som af offentlige myndigheder.

§ **20.** Løgtingið velur limir í nevndir og størv við lutfalsvali.

§ **20.** Lagtingets valg af medlemmer i kommissioner og hverv sker ved forholdsvalg.

§ **21.** Heimilt er hvørjum løgtingsmanni við tingsins loyvi at leggja fram tíl við-

§ **21.** Ethvert lagtingsmedlem kan med lagtingets samtykke bringe ethvert offent-

gerðar eitt og hvørt alment mál og tí viðvíkjandi krevja frágreiðing frá løgmanni ella landsstýrismanni.
Stk. 2. Sama rætt hevur løgtingsmaður, um tveir fimtingar av tingmonnum á fundi taka undir.

§ 22. Eingin umsókn verður løgd fyri løgtingið, uttan at tingmaður ella landsstýrið flytur hana fram.

§ 23. Løgtingsmenn eru bert bundnir av sannføring síni og ikki av forskriftum frá veljarum sínum.

§ 24. Eingin løgtingsmaður má uttan samtykki løgtingsins verða ákærdur ella fongsladur á nakran hátt, uttan so at hann verður tikin á búri.
Stk. 2. Eingin løgtingsmaður kann uttan samtykki tingsins verða kravdur til svars uttantings fyri tað, hann hevur sagt innantings.

§ 25. Samsýning løgtingsmanna verður ásett við løgtingslóg.

§ 26. Løgtingslógaruppskot, ið løgtingið hevur samtykt, fær lógargildi, tá ið tað seinast 30 dagar eftir endaligu samtyktina er staðfest av løgmanni og kunngjørt sambært kunngerðarreglum ásettum í løgtingslóg.

Útinnandi valdið

§ 27. Í landsstýrinum sita løgmaður og minst tveir landsstýrismenn.
Stk. 2. Løgmaður verður tilnevndur eftir teirri skipan, sum ásett er í § 28. Løgmaður ásetur, hvussu nógvir landsstýrismenninir skulu vera, og tilnevnir teir.

§ 28. Tá ið løgmaður skal verða tilnevndur, boðar løgtingsformaðurin formonnunum fyri flokkunum, ið umboðaðir eru á

ligt anliggende under forhandling og derom æske lagmandens eller et landsstyremedlems forklaring.
Stk. 2. Samme ret har lagtingsmedlem såfremt to femtedele af de fremmødte lagtingsmedlemmer billiger dette.

§ 22. Intet andragende må overgives lagtinget uden gennem dets medlemmer eller landsstyret.

§ 23. Lagtingsmedlemmerne er ene bundet ved deres overbevisning og ikke ved nogen forskrift af deres vælgere.

§ 24. Intet medlem af lagtinget kan uden dettes samtykke tiltales eller underkastes fængsling af nogen art, medmindre medlemmet er grebet på fersk gerning.
Stk. 2. For sine ytringer i lagtinget kan intet af dets medlemmer uden lagtingets samtykke drages til ansvar udenfor samme.

§ 25. Lagtingets medlemmer oppebærer et vederlag, hvis størrelse fastsættes ved lagtingslov.

§ 26. Et af lagtinget vedtaget forslag til lagtingslov får lovskraft, når det senest 30 dage efter den endelige vedtagelse er stadfæstet af lagmanden og kundgjort i henhold til kundgørelsesregler fastsat ved lagtingslov.

Den udøvende magt

§ 27. Landsstyret består af lagmanden og mindst to landsstyresmedlemmer.
Stk. 2. Lagmanden udnævnes efter de i § 28 fastsatte regler. Lagmanden fastsætter antallet af landsstyresmedlemmer og foretager udnævnelsen af dem.

§ 28. Når en lagmand skal udnævnes, tilkalder lagtingsformanden formanden for hvert af de i lagtinget repræsenterede

løgtingi, hvørjum sær til samráðs.

Stk. 2. Innan 10 yrkadagar eftir at fráfarandi løgmaður hevur biðið um at verða loystur úr embæti, leggur løgtingsformaður uppskot um løgmansevni fyri løgtingið. Um løgtingsval verður, ella løgmaður doyr, gongur freistin ávikavist frá tí degi, fyrsti tingfundur var eftir valið, ella frá tí degi, ið løgmaður doyði.

Stk. 3. Løgtingið skal í seinasta lagi 4. yrkadagin eftir, uttan nevndarviðgerð, greiða atkvøðu um uppskotið. Atkvøður meiri enn helmingur av øllum tingmonnum ímóti uppskotinum, er tað fallið. Annars er tað samtykt.

Stk. 4. Havnar løgtingið uppskoti frá løgtingsformanninum um løgmansevni, boðar formaðurin aftur til samráðs sambært stk. 1 og setur innan 4 yrkadagar eftir at uppskot hansara var havnað framaftur uppskot um løgmansevni, sum løgtingið sama dag greiðir atkvøðu um eftir reglunum í stk. 3.

Stk. 5. Um so er, at løgtingið fýra ferðir hevur felt uppskot løgtingsformansins um løgmann, skrivar starvandi løgmaður út nýval til løgtingið.

partier hver for sig til samråd.

Stk. 2. Lagtingsformanden fremlægger inden 10 søgnedage efter, at den afgående lagmand anmodede om sin afsked, for lagtinget forslag til lagmand. I de tilfælde, hvor der afholdes lagtingsvalg, eller lagmanden dør, løber fristen fra henholdsvis den dag, lagtinget afholdt sit første møde efter valget eller lagmandens dødsdag.

Stk. 3. Lagtinget skal senest 4. søgnedagen herefter, uden udvalgsbehandling, prøve forslaget ved afstemning. Stemmer mere end halvdelen af det samlede antal lagtingsmedlemmer mod forslaget, er det forkastet. Ellers er det vedtaget.

Stk. 4. Forkaster lagtinget lagtingsformandens forslag til lagmand tilkalder lagtingsformanden pånyt til samråd jfr. stk. 1 og fremlægger forinden 4 søgnedage efter at hans forrige forslag var forkastet pånyt forslag til lagmand som lagtinget samme dag prøver ved afstemning efter reglerne i stk. 3.

Stk. 5. Såfremt lagtinget fire gange har forkastet lagtingsformandens forslag til lagmand, udskrives der af den fungerende lagmand nyvalg til lagtinget.

§ 29. Loystur skal verða úr embæti løgmaður ella landsstýrismaður, ið biður um tað. Løgtingsformaðurin loysir løgmann úr embæti, og løgmaður loysir landsstýrismann úr embæti.

Stk. 2. Løgmaður kann eisini í øðrum førum loysa úr embæti landsstýrismann og skal loysa landsstýrismann úr embæti, um tað við atkvøðugreiðslu í løgtinginum, har ið meira enn helmingur av øllum tingmonnum atkvøður fyri, verður samtykt, at løgtingið ikki longur hevur álit á landsstýrismanni.

§ 29. Lagmanden eller et landsstyresmedlem skal afskediges, såfremt den pågældende fremsætter begæring herom. Lagmanden afskediges af lagtingsformanden og medlemmerne af landsstyret af lagmanden.

Stk. 2. Lagmanden kan også i andre tilfælde afskedige et landsstyresmedlem og skal gøre det, såfremt det ved afstemning i lagtinget, hvor mere end halvdelen af samtlige lagtingsmedlemmer stemmer for, vedtages, at lagtinget ikke længere har tillid til den pågældende.

§ 30. Um tað við atkvøðugreiðslu á løgtingi, har ið meira enn helmingur av øllum tingmonnum atkvøður fyri, verður samtykt, at løgtingið ikki longur hevur álit á løgmanni, skal løgmaður biðja løgtingsformannin loysa seg úr embæti.

§ 30. Såfremt der ved afstemning i lagtinget, hvor mere end halvdelen af samtlige lagtingsmedlemmer stemmer for, vedtages, at lagtinget ikke længere har tillid til lagmanden, skal denne anmode lagtingsformanden om sin afsked.

§ 31. Hevur løgmaður biðið um at verða loystur úr embæti sbr. § 29, ella løgtingið hevur váttað honum misálit sbr. § 30, starvar landsstýrið, til nýggjur løgmaður er tilnevndur. Í tíðarbilinum fram til, at nýggjur løgmaður er tilnevndur, kann landsstýrið ikki gera annað enn tað, sum er alneyðugt, til tess at fyrisitingin kann halda fram ótarnað. Løgmaður kann tó innan eina viku eftir, at hann fekk misálit, nýta heimild sína í § 6, stk. 2, at skriva út nýval.

§ 31. Har lagmanden begæret sin afsked jfr. § 29, eller har lagtinget udtalt, at det ikke længere har tillid til ham jfr. § 30, fungerer landsstyret, til en ny lagmand er udnævnt. I tiden indtil den nye lagmand er udnævnt, kan landsstyret kun foretage sig, hvad der er særdeles fornødent til administrationens uforstyrrede førelse. Lagmanden kan dog inden en uge efter, at lagtinget udtalte sin mistillid til ham, udskrive nyvalg i henhold til § 6, stk. 2.

§ 32. Løgtingsmaður, sum verður løgmaður ella landsstýrismaður, sigur frá sær løgtingssessin, meðan hann situr í landsstýrinum.
Stk. 2. Nærri reglur um setingarviðurskifti løgmans og landsstýrismanna verða ásettar í løgtingslóg.

§ 32. Et lagtingsmedlem, der udnævnes til lagmand eller landstyresmedlem, udtræder af lagtinget, medens vedkommende er medlem af landsstyret.
Stk. 2. De nærmere regler om lagmanden og landsstyresmedlemmernes ansættelsesforhold fastsættes ved lagtingslov.

§ 33. Løgmaður býtir málsøki landsstýrisins millum landsstýrismenninar. Teir sita fyri málsøkjum sínum hvør sær.
Stk. 2. Løgmaður samskipar starv landsstýrismanna og boðar í hesum sambandi regluliga til landsstýrisfunda, har m.a. øll uppskot landsstýrisins til løgtingslógir, ríkislógartilmæli og cykajáttanir verða framløgd áðrenn tey verða løgd fyri løgtingið.
Stk. 3. Løgmaður hevur eftirlit við, at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt.

§ 33. Lagmanden bestemmer forretningernes fordeling imellem landsstyrets medlemmer. Disse administrerer deres sagsområder hver for sig.
Stk. 2. Lagmanden koordinerer landsstyrets arbejde og indkalder i denne forbindelse regelmæssigt til landsstyresmøder hvor bl.a alle landsstyrets forslag til lagtingslove, beslutninger vedrørende rigslovgivning og tillægsbevillinger forelægges forinden de fremlægges for lagtinget.
Stk. 3. Lagmanden udøver tilsyn med, at hver enkelt landsstyresmedlem administrerer sine sagsanliggender på lovlig og forsvarlig vis.

§ 34. § 1 í hesi løgtingslóg er ikki til hindurs fyri, at landsstýrið ella stovnur undir landsstýrinum í nærri ásettan mun, við løgtingslóg fær heimild til við kunngerð at áseta rættarreglur av almennum slagi. Ein tílík heimild kann ikki verða treytað av, at reglurnar, sum ásettar verða, skulu hava góðkenning frá umboðum løgtingsins.

§ 34. Ved lagtingslov kan uanset bestemmelsen i § 1 gives landsstyret eller en af dettes institutioner i et nærmere bestemt omfang bemyndigelse til ved kundgørelse at fastsætte retsregler af generel karakter. En sådan bemyndigelse kan ikke gives med det vilkår, at regelfastsættelsen skal ske efter godkendelse af repræsentanter for lagtinget.

§ 35. Hóasi § 1 kann við løgtingslóg í nærri ásettan avmarkaðan mun heimild verða latin nevndum, stýrum og ráðum at taka endaligar fyrisitingarligar avgerðir.
Stk. 2. Løgtingið kann ikki velja limir í nevndirnar, stýrini ella ráðini, sum umrødd eru í stk. 1.

§ 35. Ved lagtingslov kan, uanset bestemmelsen i § 1, i nærmere bestemt begrænset omfang, henlægges bemyndigelser til nævn, bestyrelser og råd til at udøve endelige forvaltningsafgørelser.
Stk. 2. Lagtinget kan ikke vælge medlemmer i de i stk. 1 omhandlede nævn, bestyrelser eller råd.

§ 36. Løgmaður gev av, hvør av landsstýrismonnunum er varaløgmaður og røkir heimildir løgmans, meðan hann hevur forfall. Er eingi ásett, verða heimildir hansara røktar av tí landsstýrismanni, sum longst hevur sitið í embæti. Hava tveir landsstýrismenn sitið líka leingi, tekur hin eldri við heimildunum.

§ 36. Lagmanden fastsætter, hvem af landsstyrets medlemmer er vicelagmand, og varetager lagmandens funktioner under forfald. Er intet fastsat, udøves lagmandens funktioner af det medlem af landsstyret, der har størst anciennitet. Har to medlemmer af landsstyret lige anciennitet, har den ældste fortrinsret.

§ 37. Løgmaður og landsstýrismenn hava rættarliga ábyrgd av fyrisitingini av teim málsøkjum, sum løgd eru til teirra. Mál viðvíkjandi hesi rættarligu ábyrgd verða dømd av nevningatingi. Greiniligari reglur um hesa ábyrgd verða at áseta við løgtingslóg.

§ 37. Lagmanden og de øvrige medlemmer af landsstyret har det retlige ansvar for administrationen af det sagsområde, der er tillagt dem. Sager vedrørende dette retlige ansvar pådømmes ved nævningeting. De nærmere regler om ansvaret fastsættes ved lagtingslov.

§ 38. Løgtingið setur eina tríggja manna nevnd av løgtingsmonnum at hava eftirlit við, at starv landsstýrisins verður útint á lógligan hátt.
Stk. 2. Hevur nevndin tilgruna um, at óreglulliga hevur verið atborið, kann hon krevja, at løgtingsformaðurin setur ein kanningarstjóra, sum ikki hevur dómsmyndugleika. Hann skal, eftir at hann hevur kannað málið, gera eina frágreiðing til løgtingið, hvørt fyrisitingin í ávísum máli er útint á lógligan hátt. Tveir fimtingar av løgtingsmonnunum kunnu skrivliga seta fram sama krav.
Stk. 3. Kanningarstjórin skal hava løgfrøðiligt embætisprógv og skal ikki verða starvsettur í fyrisiting landsstýrisins, á stovni undir landsstýrinum, hjá dómsvaldinum ella fyrr hava viðgjørt málið.
Stk. 4. Kanningarstjórin hevur rætt til at krevja skrivligar ella munnligar upplýsingar frá einskildum borgarum eins og frá

§ 38. Lagtinget nedsætter af sin midte et udvalg på tre medlemmer til at have tilsyn med, at landsstyrets virksomhed foregår på lovlig vis.
Stk. 2. Såfremt udvalget får mistanke om, at uregelmæssigheder har fundet sted, kan det kræve, at lagtingsformanden udpeger en undersøgelsesleder. Den pågældende, der ikke har dømmende myndighed, skal efter stedfunden undersøgelse udarbejde en redegørelse til lagtinget, om administrationen af en konkret sag har været foretaget på lovlig vis. To femtedele af lagtingets medlemmer kan skriftligt fremsætte samme krav.
Stk. 3. Undersøgelseslederen skal have juridisk embedseksamen og må ikke være ansat i landsstyrets administration, i en af dets institutioner, ved domstolene eller tidligere have beskæftiget sig med den pågældende sag.
Stk. 4. Undersøgelseslederen er beretiget

almennum embætismonnum.

§ 39. Í løgtingslóg kann verða ásett, at løgtingið velur uttantingsmann, at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins.

Dómsvaldið

§ 40. Dómsvaldið er hjá óheftum dómstólum, sum virka sambært rættargangslógini fyri Føroyar.

Fíggjarmál landsins

§ 41. Eingin beinleiðis ella óbeinleiðis skattur má verða álagdur, broyttur ella avtikin uttan við løgtingslóg.
Stk. 2. Beinleiðis ella óbeinleiðis skattur kann ikki verða álagdur fyri inntøkur, innflutning, útflutning, sølu, gjald ella tílíkt, sum er farið fram í tíðini, áðrenn løgtingslógaruppskot um hetta varð lagt fyri løgtingið.
Stk. 3. Áðrenn løgtingsfíggjarlóg ella bráðfeingis fíggjarlóg er samtykt á løgtingi, er ikki loyvt at krevja inn teir skattir, ið nevndir eru í stk. 1.

§ 42. Lán ella borgan o.a.m., ið skuldbindur løgting, landsstýri ella stovnar undir landinum, kann ikki verða tikið ella veitt uttan við heimild í løgtingslóg.

§ 43. Fyri 1. oktober á hvørjum ári leggur landsstýrið fyri løgtingið uppskot um løgtingsfíggjarlóg fyri komandi álmanakkaár.
Stk. 2. Eingin útreiðsla má verða goldin, uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg, ella aðrari játtanarlóg, ið er í gildi, tá ið ávíst verður. Tó kann í tíðarskeiðinum fram til 1. apríl, eftir at fíggjarárið er endað, verða ávístur peningur av farnu fíggjarlógini fyri útreiðslur, ið havdar eru í farna fíggjarári.

til at fordre skriftlige eller mundtlige oplysninger såvel af private borgere som af offentlige myndigheder.

§ 39. Ved lagtingslov kan bestemmes, at lagtinget vælger en person, der ikke er medlem af lagtinget, til at have indseende med hjemmestyrets forvaltning.

Den dømmende magt

§ 40. Den dømmende magt er hos uafhængige domstole, som udøver deres virksomhed i henhold til retsplejeloven for Færøerne.

Landets finanser

§ 41. Ingen direkte eller indirekte skat kan pålægges, forandres eller ophæves uden ifølge lagtingslov.
Stk. 2. Ingen direkte eller indirekte skatter kan pålægges for indtægter, indførsel, udførsel, salg, betaling eller lignende, som er foregået i tiden, før forslag til lagtingslov herom var fremlagt i lagtinget.
Stk. 3. Forinden lagtingsfinansloven, eller en midlertidig bevillingslov er vedtaget af lagtinget, må de i stk. 1 nævnte skatter ikke opkræves.

§ 42. Lån eller kaution m.v., som forpligter lagtinget, landsstyret eller institutioner under landet, kan kun optages eller ydes med hjemmel i lagtingslov.

§ 43. Landsstyret skal hvert år inden den 1. oktober fremsætte forslag for lagtinget til lagtingsfinanslov for det kommende kalenderår.
Stk. 2. Ingen udgift må afholdes, som ikke har hjemmel i den på anvisningstiden gældende finanslov eller i anden bevillingslov. Dog kan i tidsrummet frem til 1. april efter finansårets udløb, anvises udgifter, afholdt i sidste finansår, som måtte være bevilgede på finansloven for det for-

Stk. 3. Um átlit eru til, at uppskot til fíggjarlóg ikki er liðugt viðgjørt fyri fíggjarársbyrjan, leggur landsstýrið fram uppskot um eina bráðfeingis játtanarlóg.

§ 44. Eykajáttan verður veitt við løgtingslóg.
Stk. 2. Um mál hevur skund, kann løgtingsins fíggjarnevnd eftir uppskoti frá landsstýrinum veita eykajáttan, uttan so er, at tveir fimtingar av nevndarlimunum krevja málið avgjørt við løgtingslóg.
Stk. 3. Eykajáttanir, sum fíggjarnevndin hevur veitt ígjøgnum árið, verða at góðkenna við eykafíggjarlóg í seinasta lagi 31. desember sama ár. Landsstýrið hevur skyldu at leggja fram uppskot hesum viðvíkjandi innan 1. desember.

§ 45. Landskassarokningin skal verða lagd fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok.
Stk. 2. Løgtingið velur nakrar grannskoðarar. Teir fara ígjøgnum árliga landskassarokningin og ansa eftir, at allar inntøkur landsins eru settar í rokningin, og at eingin útreiðsla er goldin uttan heimild í fíggjarlógini ella aðrari játtanarlóg. Teir kunnu krevja at fáa allar upplýsingar og øll skjøl, ið teimum tørvar. Greiniligari reglur um, hvussu mangir grannskoðarar skulu vera, og um virki teirra, verða áseltar í løgtingslóg.
Stk. 3. Landskassarokningin við viðmerkingum grannskoðaranna verður lagd fyri løgtingið til samtyktar.
Stk. 4. Reglurnar í stk. 1-3 verða eisini nýttar fyri roknskapir hjá almennum stovnum, sum hava sjálvstøðugan roknskap.

Felagsmál

§ 46. Eftir avgerð heimastýrisins verða mál yvirtikin sambært løgtingslóg.

løbne år.
Stk. 3. Kan behandlingen af finanslovforslag ikke forventes tilendebragt inden finansårets begyndelse, skal landsstyret fremsætte forslag til en midlertidig bevillingslov.

§ 44. Tillægsbevilling ydes ved lagtingslov.
Stk. 2. Såfremt en sag er af hastende karakter, kan lagtingets finansudvalg efter forslag fra landsstyret yde en tillægsbevilling, medmindre to femtedele af medlemmerne kræver sagen afgjort ved lagtingslov.
Stk. 3. Tillægsbevillinger, som finansudvalget yder i løbet af året, skal godkendes i en tillægsbevillingslov senest 31. december samme år. Landsstyret er pligtigt til at fremsætte forslag herom inden 1. december.

§ 45. Landskassens regnskab skal fremlægges for lagtinget senest seks maneder efter finansårets udløb.
Stk. 2. Lagtinget vælger et antal revisorer. Disse gennemgår landskassens årlige regnskab og påser, at samtlige landets indtægter er opført deri, og at ingen udgift er atholdt uden hjemmel i finansloven eller anden bevilingslov. De kan fordre sig alle fornødne oplysninger og aktstykker meddelt. De nærmere regler for revisorernes antal og virksomhed fastsættes ved lagtingslov.
Stk. 3. Landskassens regnskab med revisorernes bemærkninger forelægges lagtinget til beslutning.
Stk. 4. Reglerne i stk. 1-3 anvendes også for de offentlige institutioner, der fører et selvstændigt regnskab.

Fællesanliggender

§ 46. Overtagelse af et anliggende i h.t. hjemmestyrets bestemmelse sker ved lag-

§ 47. Áheitan á ríkismyndugleikarnar um at seta í gildi fyri Føroyar ríkislóg ella kongliga fyriskipan, sum setur í gildi ríkislóg fyri Føroyar, kann bert verða gjørd við ríkislógartilmæli.

§ 48. Uppskot til ríkislógartilmæli, ið løgtingið hevur samtykt, fær gildi, tá ið tað seinast 30 dagar eftir endaligu samtyktina er staðfest av løgmanni og sent ríkismyndugleikunum.

§ 49. Landsstýrið ummælir tey uppskot til kongligar fyriskipanir, sum ikki seta ríkislóg í gildi í Føroyum. Hetta galdur somuleiðis fyri allar kunngerðir, sum ráðharri sendir heimastýrinum við atliti at gildisseting í Føroyum.

§ 50. Um heimild við ríkislóg ella við kongligari fyriskipan er løgd til heimastýrið, verða almennar reglur sambært slíkari heimild at áseta við løgtingslóg; í øðrum førum liggur heimildin hjá landsstýrinum.
Stk. 2. Í teimum førum, sum heimild er løgd heimastýrinum í kunngerð frá ráðharra, er hon hjá landsstýrinum.

§ 51. Landsstýrið umboðar heimastýrið mótvegis ríkismyndugleikunum.
Stk. 2. § 52, stk. 2 og 3, galda á sama hátt í hesum førum.

Millumtjóðasáttmálar

§ 52. Landsstýrið hevur málsrøði í førum, sum heimastýrinum er heimilað at tingast við og gera avtalur við onnur lond.

tingslov.

§ 47. Indstilling til rigsmyndighederne om ikraftsættelse af rigslovgivning på Færøerne, hvadenten det sker som en egentlig rigslov eller som en kongelig anordning om ikraftsættelse for Færøerne af en rigslov, kan kun ske ved beslutning om indstilling til rigsmyndighederne om ikraftsættelse (beslutning vedrørende rigslovgivning).

§ 48. Et af lagtinget vedtaget forslag til beslutning vedrørende rigslovgivning får gyldighed, når det senest 30 dage efter den endelige vedtagelse er stadfæstet af lagmanden og oversendt rigsmyndighederne.

§ 49. Landsstyret udtaler sig om sådanne forslag til kongelige anordninger, der ikke sætter rigslovgivning i kraft på Færøerne. Det samme gælder alle de bekendtgørelser, som et ministerium oversender med henblik på eventuel ikraftsættelse på Færøerne.

§ 50. Såfremt der ved rigslov eller kongelig anordning er henlagt bemyndigelser til hjemmestyret, skal generelle regler fastsættes ved lagtingslov; i andre tilfælde har landsstyret bemyndigelsen.
Stk. 2. Såfremt der ved en ministeriel bekendtgørelse er henlagt bemyndigelser til hjemmestyret, er det landsstyret, der har den pågældende bemyndigelse.

§ 51. Landsstyret repræsenterer hjemmestyret overfor rigsmyndighederne.
Stk. 2. § 52, stk. 2 og 3, er på samme måde gældende i disse tilfælde.

Internationale traktater

§ 52. Såfremt hjemmestyret er tillagt hjemmel til at forhandle med og indgå aftaler med andre lande, udøver landsstyret

Stk. 2. Uttan samtykki løgtingsins kann landsstýrið tó ikki gera avtalur, sum krevja luttøku løgtingsins fyri at verða útintar, ella sum annars eru týdningarmiklar.
Stk. 3. Samstundis sum slík avtala verður løgd fyri løgtingið til góðkenningar, boðar landsstýrið frá, hvørjar løgtingslógir og hvørji ríkislógartilmæli, neyðug eru, til tess at millumlandasáttmálin kann verða útintur.

denne ret på hjemmestyrets vegne.
Stk. 2. Landsstyret kan dog ikke uden lagtingets samtykke indgå nogen aftale, til hvis opfyldelse lagtingets medvirken er nødvendig, eller som iøvrigt er af større betydning.
Stk. 3. Når en sådan aftale fremlægges i lagtinget til godkendelse, skal landsstyret samtidig meddele hvilke lagtingslove og hvilke beslutninger vedrørende rigslovgivning, som er nødvendige for opfyldelse af den pågældende traktat.

§ 53. Landsstýrið ummælir heimastýrisins vegna teir millumtjóðasáttmálar, sum ríkismyndugleikarnir leggja fyri heimastýrið til ummælis.
Stk. 2. § 52, stk. 2 og 3, gilda á sama hátt í hesum førum.

§ 53. Landsstyret udtaler sig på hjemmestyrets vegne om de internationale traktater, som rigsmyndighederne forelægger hjemmestyret til udtalelse.
Stk. 2. § 52, stk. 2 og 3, er på samme måde gældende i disse tilfælde.

§ 54. Løgtingið velur millum løgtingsmenn eina uttanlandsnevnd við sjey limum, sum landsstýrið ráðførir seg við, áðrenn avgerðir verða tiknar, ið hava stóran uttanlandspolitiskan týdning.
Stk. 2. Somuleiðis skal landsstýrið ráðføra seg við hesa nevnd í sambandi við samráðingar við ríkismyndugleikarnar av stórum týdningi fyri viðurskiftini Føroya og Danmarkar millum.

§ 54. Lagtinget vælger af sin midte et udenlandsnævn på syv medlemmer, med hvilket landsstyret rådfører sig forud for enhver beslutning af større udenlandspolitisk rækkevidde.
Stk. 2. På samme måde skal landsstyret rådføre sig med dette udvalg i forbindelse med forhandlinger med rigsmyndighederne af større betydning for forholdet mellem Færøerne og Danmark.

§ 55. Løgtingslóg, ella partur av løgtingslóg, hevur ikki gildi, um
a) hon gongur ímóti millumtjóðasáttmála, heimastýrið hevur gjørt við onnur lond,
b) hon gongur ímóti millumtjóðasáttmála, Danmørk hevur gjørt við onnur lond, og sum eisini fevnir um Føroyar.

§ 55. En lagtingslov eller en del af en lagtingslov har ikke gyldighed, såfremt
a) den strider imod en international traktat, hjemmestyret har indgået med andre lande,
b) den strider imod en international traktat, Danmark har indgået med andre lande, og som også omfatter Færøerne.

Kommunurnar

§ 56. Rættur kommunanna at skipa egin viðurskifti undir eftirliti landsstýrisins verður ásettur í løgtingslóg, m.a. í hvønn mun kommunur og millumkommunufelags-

Kommunerne

§ 56. Kommunernes ret til under landsstyrets tilsyn selvstændigt at styre deres anliggender bestemmes ved lagtingslov bl.a. i hvilket omfang kommuner og inter-

skapir kunnu skuldbindast við láni, borgan o.ø.m.

Fyriskipanir um gildiskomu

§ 57. Um so er, at løgtingið samtykkir uppskot til broytingar av hesi løgtingslóg, kann samtykta løgtingslógaruppskotið ikki beinanvegin verða staðfest av løgmanni. Hitt soleiðis samtykta løgtingslógaruppskotið skal eftir næsta val verða samtykt óbroytt í fyrstu setu nývalda tingsins, og kann síðan verða staðfest á vanligan hátt av løgmanni.

Stk. 2. Verður heimastýrislógin broytt, kunnu uppskot um at broyta hesa løgtingslóg, orsakað av broytingini í heimastýrislógini, verða samtykt og staðfest eftir vanligum reglum.

§ 58. Løgtingslógin fær gildi ólavsøkudag 1995.

Stk. 2. Samtundis fara úr gildi:

a) Løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum seinast broytt við løgtingslóg nr. 2 frá 3. januar 1985.
b) Løgtingslóg nr. 2 frá 13. mai 1948 um umboðsvald Føroya.
c) Løgtingslóg nr. 22 frá 22. mai 1962 um millumtinganevnd í fiskimarks- og felagsmarknaðamálum.
d) § 2, stk. 2, 2. pkt., í løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Føroya løgting seinast broytt við løgtingslóg nr. 68 frá 13. mai 1992.

Stk. 3. Stk. 3. § 33 í hesi løgtingslóg fær tó ikki gildi fyrr enn Ólavsøkudag 1996. Til tíðenda § fær gildi, hava § 6 í løgtingslóg nr. 1 frá 13. 05.1948 um stýriskipan Føroya í sermálum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 2 frá 03.01.1985 og § 8 í løgtingslóg nr. 2 frá 13.05.1948 um umboðsvald Føroya framvegis gildi.

kommunale selskaber kan forpligtes ved lån, kaution m.v.

Ikrafttrædelsesbestemmelser

§ 57. Såfremt lagtinget vedtager forslag til ændringer i denne lagtingslov, kan det således vedtagne lagtingslovsforslag ikke umiddelbart stadfæstes af lagmanden. Det således vedtagne lagtingslovsforslag skal efter førstkommende valg til lagtinget, i det nyvalgte lagtings første lagtingsår, vedtages uændret og kan derefter stadfæstes på normal vis af lagmanden.

Stk. 2. Såfremt de foreslåede ændringer af denne lagtingslov alene skyldes ændringer i hjemmestyreloven, kan disse vedtages og stadfæstes efter de almindelige regler.

§ 58. Lagtingsloven træder i kraft 1. januar 1995.

Stk. 2. Samtidig ophæves:

a) Lagtingslov nr. 1 af 13. maj 1948 om Færøernes Styrelsesordning i Særanliggender, som senest ændret ved lagtingslov nr. 2 af 3. januar 1985.
b) Lagtingslov nr. 2 af 13. maj 1948 om Færøernes Forvaltning.
c) Lagtingslov nr. 22 af 22. maj 1962 om et siddende lagtingsudvalg i fiskerigrænse- og fælledsmarkedsspørgsmålene.
d) § 2, stk. 2, 2. pkt., i lagtingslov nr. 49 af 20. juli 1978 om valg til Færøernes lagting, som senest ændret ved lagtingslov nr. 68 af 13. maj 1992.

Stk. 3. § 33 i denne lagtingslov træder dog ikke i kraft førend 1. januar 1996. Indtil denne § træder i kraft, bevarer § 6 i lagtingslov nr. 1 af 13.05.1948 om Færøernes styrelsesordning i særanliggender, som senest ændret ved lagtingslov nr. 2 af 03.01.1985 og § 8 i lagtingslov nr. 2 af 13.05.1948 om Færøernes forvaltning deres gyldighed.

Viðmerkingar:

Í seinastu tingsetu (løgtingsmál nr. 190/1993) samtykti løgtingið við 24-0 atkvøðum nýggja løgtingslóg um stýrisskipan Føroya.

Lógin kann eftir § 30 bert broytast, um broytingin eisini verður samtykt av nývalda løgtinginum í fyrstu tingsetuni aftan á valið.

Vísandi hertil leggur landsstýrið málið aftur fyri tingið at samtykkja av nýggjum.

Í uppskoti til samtyktar um setan av nevnd at gera uppskot til broytingar í tingskipanini, so hon samsvarar við nýggju stýrisskipannarlógina. Nevndin skal leggja uppskot fyri løgtingið samstundis, sum uppskotið um nýggja stýrisskipan kemur til viðgerðar á øðrum sinni.

Hetta er ikki gjørligt, men tá nýggja stýrisskipannarlógin ikki kemur í gildi fyrrenn 29. juli 1995, er góð tíð til at koma við uppskoti og fáa samtykt neyðugar broytingar í tingskipanini.

1. viðgerð 22. juli 1994. Málið varð beint í serligu stýrisskipannarnevndina, sum 25. juli 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Í seinastu tingsetu, løgtingsmál nr. 190/93: Løgtingsmál um stýrisskipan Føroya, samtykti løgtingið við 24-0 atkvøðum nýggja lóg um stýrisskipan Føroya.

Lógin kann eftir fyriskipanum sínum um gildiskomu bert koma í gildi, um lógin eisini verður samtykt av nývalda løgtinginum óbroytt í fyrstu setu nývalda tingsins.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 20. juli 1994 og eftir 1. viðgerð 22. juli 1994 beint í serliga stýrisskipannarnevnd.

Í nevndina vórðu vald: Bjørn á Heygum fyri sambandsflokkin, Anfinn Kallsberg fyri fólkaflokkin, Marita Petersen fyri javnaðarflokkin, Jógvan Durhuus fyri tjóðveldisflokkin, Kristian Magnussen fyri verkamannafylkingina, Helena Dam á Neystabø fyri sjálvstýrisflokkin, Lasse Klein fyri kristiliga fólkaflokkin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk og Petur Jacobsen fyri miðflokkin.

Nevndin skipaði seg við Bjørn á Heygum sum formanni og hevur viðgjørt málið á fundi 22. juli 1994. Nevndarformaðurin mælti til, at tveir limir í umrøddu nevnd gjølliga kanna, um talan er um sama lógaruppskot, sum landsstýrið nú leggur fram at samtykkja nývalda løgtinginum.

Semja var um, at Bjørn á Heygum og Anfinn Kallsberg átaka sær at eftirkanna orðingina í fyriliggjandi lógaruppskoti frá landsstýrinum til tess at tryggja, at samleiki (identitetur) er millum hetta uppskot og tað, sum áður er samtykt av løgtinginum.

Undir viðgerðini varð sett fram ynski frá nývaldu nevndarlimunum um, at nevndin kannaði

grein fyri grein nýggja lógaruppskotið til tess, at nýggju tinglimirnir kundu seta fram fyrispurningar og fáa svar viðvíkjandi innihaldinum í lógargreinunum. Semja var í nevndini um at lesa upp allar greinarnar og at svara møguligum spurningum. Síðani vórðu lógargreinarnar lisnar upp, og settir fyrispurningar vórðu svaraðir.

Síðani hava tinglimirnir Bjørn á Heygum og Anfinn Kallsberg eftirkannað lógartekstin, og hava báðir tikið til eftirtektar, at fyriliggjandi tilfar er tað sama sum tað, ið samtykt er í fyrra lógarmálinum, løgtingsmál nr. 190/93: Løgtingslóg um stýrisskipan Føroya.

Í løgtingsmáli nr. 207/93: Løgtingslóg um stýrisskipan Føroya sigur landsstýrið í viðmerkingunum:

"Fyri at tryggja sær, at tingskipanin verður broytt í sambandi við nýggju stýrisskipannarlógina, og at arbeiðið verður framt eftir ætlanini hjá tí tingi, ið samtykti stýrisskipannarlógina fyrru ferð, verður mælt til, at tingið av nýggjum samtykkir uppskotið til samtyktar um broyting í tingskipanini, tó við teirri broyting, at nýggj tíðarfreist verður ásett fyri, nær uppskotið skal verða greitt at leggja fyri tingið."

Í løgtingsmálinum nr. 190/93 varð gjørd soljóðandi samtykt:

"Løgtingið setir nevnd við sitandi formanni í tinginum og fyrrverandi formonnum løgtingsins Lassa Klein, Anfinn Kallsberg, Jacob Lindenskov, Hergeir Nielsen, Jógvan Sundstein, Agnar Nielsen og Hilmar Bech, at gera uppskot til broyting av tingskipan løgtingsins soleiðis, at tingskipanin m.a. samsvarar tí av løgtinginum í juni 1994 í fyrsta umfari samtykta uppskoti til løgtingslóg um stýrisskipan Føroya. Álitið verður at leggja fyri løgtingið samstundis, sum uppskotið um nýggja stýrisskipan kemur til viðgerðar á øðrum sinni."

Nevndin ásannar, at hetta als ikki kann lata seg gera við so neyvari tíðarfreist og mælir til, at hetta sera týdningarmikla arbeiðið verður gjørt dyggiliga og við rúmari tíðarfreist, tí talan verður um at seta upp eina heilt nýggja tingskipan við útgreinaðum reglum, har serliga viðmerkingarnar í komandi álitinum krevja drúgt og haldgott forarbeiði. Mælt verður tí til, at hetta álit verður lagt fram áðrenn árslok 1994, og setir **ein sama nevnd** í staðin fyri nevndu løgtingssamtykt fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið setir nevnd við sitandi formanni í tinginum, og fyrrverandi formonnum løgtingsins Lassa Klein, Anfinn Kallsberg, Jacob Lindenskov, Hergeir Nielsen, Jógvan Sundstein, Agnar Nielsen og Hilmar Bech, at gera uppskot til broyting av tingskipan løgtingsins soleiðis, at tingskipanin m.a. samsvarar tí av løgtinginum í juni samtykta uppskot til løgtingslóg um stýrisskipan Føroya. Álitið verður at leggja fyri løgtingið í seinasta lagi fyri árslok 1994.

Samd nevnd mælir til at samtykkja lógaruppskotið og uppskotið til samtyktar frá serligu stýrisskipannarnevndini.

2. viðgerð 25. juli 1994. Uppskotið til samtyktar samtykt við 26-0 atkvøðum. Samtykt at beina málið til 3. viðgerð við 26-0 atkvøðum.

3. viðgerð 25. juli 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

FL jnr. 105-1/90.

Lóg nr. 103 frá 26. juli 1994.

100-1 Trygdargrunnurin fyri avreiðingar og lønir

Ár 1993, hósdagin 21. oktober boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi frá Jógvan I. Olsen, løgtingsmanni, til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

Tá lógin um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir varð broytt 8. mai 1991, varð trygdin fyri avreiðuingar skorin niður til, at í mesta lagi kundi fáast helvtin av tí, ið mist var, og at avreiðingin ikki átti vera meiri enn 14 dagar eldri enn ásetti freistardagurin.

Viðvíkjandi lønum á landi skuldu fólk fáa ait, tey høvdu mist, upp til kr. 70.000,00 í part, og at lønirnar kundu vera 180 dagar eldri enn ásetti freistardagurin.

Við hesi broyting kom trygdargrunnurin næstan bara at galda fyri lønir á landi, men skip og hátar skuldu kortini framhaldandi gjalda inn í grunnin.

Hesin grunnur, sum í síni tíð varð stovnaður við tí eina endamálinum at tryggja monnum peningin fyri avreiðingar í Føroyum, er vorðin tii ein grunn, sum álegði fiskiførunum skyldu at gjalda inn í grunnin, meðan tey lítlan og ongan rætt høvdu til at fáa nakað ur honum aftur.

Fyri at bøta um hesa avskeplaðu skipan tegði undirritaði fram uppskot í seinastu tingsetu (løgtingsmál nr. 9/1992) um at broyta lógina um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir.

Hetta uppskot fall.

Meðan ein meiriluti í arbeiðaramálanevndini, Sverre Midjord, Hergeir Nielsen, Asbjørn Joensen og Birgir Danielsen, í álitinum til hetta mál settu fram eitt uppskot til samtyktar, ið var soljóðandi:

"Álagt verður landsstýrinum at fara undir at tilevna hetta lógarverk soleiðis, at øll, ið arbeiða á landi og á sjógvi, skulu vera líka fyri lógini, serliga tá talan er um fyrningarfreist og ágóða."

Hetta uppskotið samtykti løgtingið.

Tí lovyi eg mær at spyrja:

Hvat líður landsstýrinum við at tilevna hetta lógarverk?

og nær kann tað væntast at verða lagt fyri løgtingið?

Við 24-0 atkvøðum varð 28. oktober 1993 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

23. november 1993 svaraði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður soleiðis:

SVAR

31. august 1992 legði landsstýrið fram uppskot fyri løgtingið um broytingar í løgtingslógini um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m. Uppskotið varð eftir 1. viðgerð tann 21. oktober 1992 beint í arbeiðaramálanevndina. 10. mai 1993 leggur arbeiðaramálanevndin fram álit, har skotið verður upp, at dagatalið í uppskoti landsstýrisins (§ 1, stk. 2) verður hækkað úr 14 upp í 30 dagar. Samstundis verður vist til uppskot til samtyktar í løgtingsmáli nr. 9/1992 har sagt verður: "Álagt verður landsstýrinum at fara undir at tilevna hetta lógarverk soleiðis, at øll, ið arbeiða á landi og sjógvi, skulu vera líka fyri lógini, serliga tá talan er um fyrningarfreist og ágóða." Hetta uppskot frá arbeiðaramálanevndini varð samtykt hin 11. mai 1993.

Uppskot landsstýrisins um broyting í lógini um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m. varð samtykt 13. mai 1993, tó soleiðis at 14 dagar í § 1, stk. 2, varð broytt til 30 dagar.

Av tí, at løgtingið hevur aftaná samtyktina 11. mai 1993 samtykt uppskot landsstýrisins við broytingum 13. mai 1993, metir landsstýrið løgtingssamtyktina at vera burturdottna.

100-2 Embætismannahjálp úr Danmark

Ár 1993, hósdagin 28. oktober boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi til løgmans frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

Undir viðgerðini av avtaluni frá 12. oktober í ár millum donsku stjórnina og Føroya landsstýri á danatingi hin 27. oktober varð spurningur reistur um danska hjálp til føroysku umsitingina at tætta tey hol í lóggávuarbeiðnum, sum neyðugt er, fyri at lærtu pengarnir verða í Føroyum og koma vinnulívinum her til gagns.

Hevur landsstýrið biðið danir um hesa hjálp? Ella ætlar landsstýrið at gera tað?

Viðmerkingar:

6. oktober 1992 varð politiska stýringin í Føroyum flutt niður á Christiansborg. Verður nú

eisini umsitingin flutt niður hagar, er hetta ein dómur yvir dugnaloysi, sum tekur undir við kravinum hjá fólki um, at landsstýrið leggur frá sær og umsitingin útskift.

Við 23-0 atkvøðum varð samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

20. januar 1994 svaraði løgmaður soleiðis:

SVAR

Í spurninginum ella viðmerkingunum til spurningin verður víst til viðgerðina í fólkatinginum tann 27. oktober 1993 um avtaluna frá 12. oktober 1993 millum stjórnina og landsstýrið. Tó at ikki beinleiðis verður sagt, hvat hugsað verður um, rokni eg við, at tað spyrjarin sipar til, er viðmerkingin frá Ole M. Nielsen (KRF).

Sitat:

> "Vi skal ikke blande os i udformningen af de tiltag, der skal foretages, men vi vil meget gerne anbefale, at man i det omfang, det findes nødvendigt, benytter danske embedsmænd som rådgivere til de komplicerede og ubehagelige ting, der skal foretages for at få den færøske økonomi op at stå igen. Det kunne måske tænkes, at man savnede mennesker, der var ubetastet af færøske forhold, til at hjælpe med at forklare det færøske folk om baggrunden for og nødvendigheden af de meget ubehagelige tiltag."
>
> "Når pengene forsvinder så godt, som de gør, er det jo bl.a., fordi den færøske lovgivning ikke er tilstrækkelig på det område og måske på andre områder.
>
> Så vi har ikke anbefalet en bestemt løsning. Der er ikke andre end det færøske folk til at angive løsningerne, men vi vil gerne stille nogle embedsmænd til rådighed til at hjælpe dem med at finde ud af det."

Sitat endað.

Landsstýrið hevur ikki í sambandi við tey tiltøk, ið eru framd eftir avtalurnar við donsku stjórnina, biðið danir um hjálp og ætlar heldur ikki at gera tað.

Føroyska umsitingin er lítil og hevur ikki allar tær royndir og teir serfrøðingar, sum landsumsitingar í øðrum londum, vit samanbera okkum við, hava. Hetta merkir, at landsumsitingin í ávísum førum hevur fingið konsulenthjálp uttanífrá m.a. úr Danmark. Viðvíkjandi lógarsmíði hevur hetta tó ikki verði gjørt.

100-3 Áheitan á landsstýrið um at fáa lista yvir kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir, sum landsstýrið o.fl. fylgja.

Ár 1993, týsdagin 16. november boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrspurningi frá Hergeiri Nielsen, løgtingsmanni, til løgmanns, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

Kann Føroya Landsstýri lata Føroya Løgtingi eitt regluligt yvirlit yvir tær kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir, sum landsstýrið o.fl. fylgja, men sum ikki verða kunngjørdar í almenna lýsingablaðnum.

Viðmerkingar:

Eftir spyrjarans fatan fremur umsiting landsstýrisins greitt lógarbrot, um tað noktar at lýsa tær reglugerðir og kunngerðir, sum landsstýrið hevur samtykt á landsstýrisfundum.

Spyrjarin hevur reist málið á tingi fyrr, og hevur fingið viðhald frá rættarnevnd løgtingsins, sum so aftur hevur fingið viðhald frá Føroya Løgtingi.

Somuleiðis verður víst á úrskurð og viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum í tingmáli nr. 4-2/92: Grannskoðan av almennum roknskapum, Strandfaraskip landsins 1989-91, har teir eisini átala, at landsstýrið ikki lýsir tær reglur, sum tað sjálvt samtykkir, og sum tað eftir lógini um almennt kunngerðablað hevur skyldu til at lýsa. Eisini hesar átalur eru farnar óskornar gjøgnum Føroya Løgting, men umsiting landsstýrisins letur ikki við seg koma.

Í løgtingslóg nr. 109 frá 17. desember 1987 um almennt kunngerðablað stendur í § 2. stk.: "Í kunngerðablaðið skulu allar løgtingslógir og kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur givnar av landsstýrinum lýsast."

Henda grein verður ikki fylgd av umsitingini, og verður tí hesin fyrispurningur at skilja sum enn ein roynd eftir skipaðum viðurskiftum, so at løgtingsmenn o.o. fáa høvi til at fylgja við í teimum fyriskipanum, samfelag okkara verður rikið eftir.

Við 25-0 atkvøðum varð 23. november 1993 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

17. februar 1994 svaraði løgmaður soleiðis:

SVAR

Sambært § 2, 1. stk. í løgtingslóg nr. 109, frá 17. desember 1987 um almennt kunngerðablað skulu allar løgtingslógir, kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur, sum landsstýrið hevur ásett, lýsast.

Í hesum liggur, at tað, ið lýsast skal, eru lógir, kunngerðir o.a., sum, fyri at fáa gildi, skulu lýsast.

Tænastuboð og reglur, ið verða givin vegna tað, at talan er um yvir-/undirskipanarviðurskifti, krevja onga lógarheimild. Hægsti fyrisitingarligi myndugleikin er landsstýrið.

Dagliga verða gjørdar reglur og boð, bæði frá stovni til undirskipaðan stovn og frá yvirmanni til undirmann.

Slík boð kunnu vera munnlig ella skrivlig; men tey kunnu eisini verða alment orðað t.v.s. sum ein reglugerð, og tey kunnu hava almennan áhuga. Tey hava bert gildi til tann, ið gav boðini, ella annar, sum hevur heimild til tess, broytir tey.

Sambært § 2, 2. stk., kunnu verða sett í kunngerðablaðið:

a) Lýsingar, fráboðanir o.t. frá tí almenna.
b) Kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur frá øðrum almennum stovnum enn landsstýrinum og fráboðanir frá privatum í rættarviðurskiftum.

Við hesi lógargrein er ætlanin ikki, at allar almennar fyriskipanir skulu lýsast, men lógin loyvir, at ymiskt kann verða lýst sum upplýsing til borgaran og ikki sum lógarkrav.

Hendan parturin av Kunngerðablaðnum eru vit ikki farin at geva út. Um farið verður í holt við at geva seinna partin av Kunngerðablaðnum út, so eigur blaðið at fevna um alt 2. stk. í § 2, t.v.s. eisini fráboðanir frá privatum í rættarviðurskiftum. Talan hevði her verið um eitt blað sum danska Ministerialtidende og Statstidende í einum.

Skal Kunngerðablaðið koma út í víðkaðari útgávu, má løgtingið seta pening av til tess. Neyðugt verður at seta ein blaðstjóra, og má blaðið koma út einar tvær ferðir um vikuna, um allar almennar fráboðanir frá sorinskrivaranum, landfútanum, advokatum o.ø. skulu setast í blaðið. Talan verður sostatt ikki um eina lítla upphædd.

Við einum slíkum blaði hevði løgtingið havt møgulcika at gjørt seg kunnugan við reglugerðir o.a., ið almenna umsitingin metti hevði almennan áhuga, men løgtingið hevði tó onga trygd fyri at fingið kunlcika til alt.

Landsstýrið heldur ikki, at tað fyrisitingarliga er gjørligt at kunna løgtingið um allar tær fyriskipanir, skrivaðar sum óskrivaðar, ið verða gjørdar á almennum stovnum, og landsstýrið kennir heldur ikki allar hesar.

Annars kann viðmerkjast, at verður reglugerð lýst, sum sambært lógini ikki skal verða lýst, er best, at broytingar ella avtøka eisini verða lýstar. Hetta er tó ongin treyt fyri, at broytingin ella avtøkan fáa gildi.

100-4 Viðurskiftini hjá menningartarnaðum í Vágum

Ár 1993, týsdagin 23. november boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, frá Svend Aage Ellefsen, løgtingsmanni, sum var soljóðani

FYRISPURNINGUR

1. Ætlar landsstýrið at seta á stovn frítíðar/umlættingartiltak og/ella vardan verkstað til menningartarnað yvir barnagarðsaldur í Vágum?

2. Nær væntar landsstýrið í so fall, tey menningartarnaðu kunnu fáa tilboð um tílíka tænastu?

3. Ætlar landsstýrið at útvega íbúðarmøguleikar (t.d. sambýli) fyri menningartarnaðum á smærru oyggjunum?

Viðmerkingar:

Í nøkur ár høvdu menningartarnað smærri og støtri børn í Vágum møguleikan at fáa frítíðar- og umlættingarhjálp og annars verða ansað gjøgnum tiltakið "Daljanstovu" í Sandavági.

Við tað, at tiltakið varð figgjað yvir játtanina til barnaforsorg (rakstrarstað 19557) og Almannastovan ongantíð rættiliga fekst at taka undir við tí, varð ikki møguligt at "legalisera" tiltakið til stovn, men gjørdist heldur mótvindurin frá almennari støðugt sterkari. Hóast Almannastovan sendi út uppsagnarbrøv til teirra, ið starvaðust har seinasta heyst, eydnaðist kortini at halda Daljanstovu opnað til eftir landsstýrisskiftið fyrr í ár, men eftir summarfrítíðina kom so stígur í.

Í sambandi við, at barnagarður letur upp í Søtvági komandi ársskiftið, varð kortini longu í vár avrátt, at pláss skuldu útvegast á barnagarðinum til menningartarnað smáhørn eisini úr hinum bygdunum í Vágum, og fer hetta ivaleyst at verða til stóra hjálp.

Eftir standa nú trupulleikarnir hjá menningartarnaðum í skúlaaldri, teimum hálvvaksnu og eldru.

Góðar royndir verða gjørdar innan skúlaverkið, at integrera" tey brekaðu í fólkaskúlafrálæruna, men eftir skúlatíð eru ongi tilboð.

Saknurin er sostatt ómetaliga stórur eftir einum frítíðar- og/- ella umlættingartiltaki, sum samstundis kundi virka sum ein minni vardur verkstaður.

Tað hevur mangan verið sagt, at játtannarreglurnar í Føroyum eru ov stirvnar, tá tað snýr seg um at finna hóskandi loysnir til smærru oyggjarnar. Neyðugt hevur verið at skipað seg eftir donskum reglum, og trupult hevur tí stundum verið at gjørt nýggj framtriv. Nú eisini statsrelutsiónin á almannaøkinum fer í blokkin, átti at ligið betri fyri við egnaðum føroyskum loysnum.

Nú eigur at vera gjørligt, eisini í so fólkaflátøkum øki sum í Vágum, at skipa eitt tiltak, sum bæði kann virka sum umlættingar/frítíðarstað og vart verkstað! Ónýtt egnað hús finnast allastaðni, ikki minst í Vágum.

Hóast fremsti málsetningurin má vera, at eisini tey menningartarnaðu í mest møguligan mun verða "integrera" á vanliga arbeiðsmarknaðinum, verða mong av teimum at hjálpast við tiltøk frá tí almenna.

Tá barnagarðs- og skúlamøguleikar finnast, og útvegir vónandi fáast fyri frítíðar-/umlættingar- og verkstaðarvirksemi, koma tey menningartarnaðu betri at støðast í heimaumhvørvinum í uppvøkstrinum.

Tey avvarðandi seta sær tá náttúrliga spurningin, hvørt gjørligt verður eisini sum vaksin at støðast í heimbygdini, har tey kenna seg tryggan. Av áhuga er tí spurningurin, hvørt møguleiki verður at økja talið av sokallaðum sambýlum, sum eru lutfalsliga vælegnað í smærri økjum og ódýr í rakstri.

Heldur enn at bera seg undan at gera skynsemisbroytingar innan heilsuverkið við sparingum upp á 30 - 50 mió. kr. fyri eyga, og heldur enn at hækka forsorgarlógina við 50 - 60 mió. kr., átti politiski játtanarmyndugleikin at hjálpt teimum brekaðu - eisini á smærru oyggjunum - til mannsøkulig viðurskifti.

Undirritaði hevði hertyri, saman við avvarðandi at menningartarnaðum, umboðum fyri skúlarnar og landsskúlamyndugleikararnar, kommunalu myndugleikarnar og øðrum, møguleika at luttaka á fundi, sum felagið JAVNI skipaði fyri í Miðvági um hesi viðurskiftini.

Ikki minst við atliti til hendan fundin loyvi eg mær at seta landsstýrismanninum omanfyristandandi spurningar.

Við 26-0 atkvøðum varð samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

1. februar 1994 svaraði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður soleiðis:

SVAR

Áðrenn farið verður undir at svara sjálvum spmingunum, skulu fyrst gerast nakrar viðmerkingar til stuðulstiltakið "Daljanstova", sum eisini verður umrøtt í viðmerkingunum til fyrispurningin.

Felagskommunan í Vágum heitti 29. desember 1988 eftir áheitan frá Torkil Haraldsen, tali- og hoyrilærari, Elsu Margit Davidsen, barnagarðslærari og Mariu Nordendal Petersen, heilsusystir, á Almannastovuna um at seta á stovn stuðulsstovu til brekað børn í Vágum, fyribils í eitt 2 ára tíðarskeið.

Almannastovan setti á stovn stuðulstiltakið "Daljanstovu" sambært §22, stk. 3 í barnaforsorgarlógini sambært lógarkunngerð nr. 104 frá 2. mars 1988 - "Bekendtgørelse om lov om Færøerne om børneforsorg" - við seinni broytingum. Tiltakið varð skipað sum individuellur

stuðul til fleiri børn, ið her varð samskipað. Tiltakið fór í gongd 1. september 1989.

Børnini, sum ætlanin var at taka inn í stuðulsstovuna, vóru tilmeldaði Landsskúlafyrisitingini, sum syrgdi fyri neyðugum kanningum og sendi síðani frágreiðing til felagskommunalu nevndina í Vágum.

Almannastovan gjørdi sambært §22, stk. 4 í barnaforsorgarlógini av, hvørji børn skuldu koma á stuðulsstovuna. Avgerðin varð tikin eftir ummæli frá barnaverndarnevndini, og tá ið foreldrini ynsktu tað.

Tá ið tiltakið byrjaði, vóru 7 børn upptikin í aldrinum 1½ til 8 ár.

Tiltakið var frá byrjan eitt fyribils tiltak í eitt avmarkað tíðarskeið upp á 2 ár, sum tað framgongur av fundarfrásagnunum frá tí fundarvirksemi, ið var í 1989. Tað hevur ongantíð verið ætlanin, at tiltakið skuldi "legatiserast" til ein stovn, ei heldur er heimild í lóggávuni at skipa tiltakið sum stovn ella døgnstovn.

Almannastovan avgjørdi á fundi 29. mai 1992 at niðurleggja "Daljanstovu" pr. 30. september 1992. Við táverandi barnatali var einki grundarlag fyri at halda fram í tiltaksins skapi. Almannastovan staðfesti, at foreldur at brekaðum børnum í Vágum ikki vóru hugað í nóg stórum tali at nýta tilboðið. Tað varð ásannað, at hóast fitt av børnum við ymiskum breki vóru í Vágum, so varð tiltakið ikki nýtt í nóg stóran mun.

Kommunan í Sørvági boðaði í skrivi, dagfest 24. september 1992 frá, at áhugi var at fyrireika stovnsetan av barnagarði í bygdini, har eisini pláss verður fyri børnum í oynni, sum av likamligum, sálarligum ella sosialum orsøkum, hava tørv á meira stuðli enn tann, sum heimið megnar at geva.

Út frá hesum fyritreytum varð avgjørt, at "Daljanstova" kundi halda fram til 31. desember 1992.

Men av ymiskum orsøkum dróg málið við barnagarðinum í Sørvági út, og varð "Daljanstova" hildin opin, til hon endaliga varð niðurløgd 1. oktober 1993.

Tá tað gjørdis greitt, at "Daljanstova" skuldi niðurleggjast, kom rættilig gongd á at láta barnagarð upp í Sørvági. Kommunan avgjørdi tí, at menningartarnaði børn í Vágum eisini skuldu nýta stovnin, og varð tað tí í § 2, stk. 2 í reglugerðini fyri barnagarðin ásett, at sambært samtykt í Felagskommununi í Vágum, dagfest 30. oktober 1992 er endamál stovnsins at samskipa ansingina soleiðis, at børn við likamligum, sálarligum og sosialum orsøkum, sum hava tørv á meira stuðli enn tann, sum heimið megnar at geva, eisini skulu verða umfatað av ansingini.

Tey fýra børnini, sum vóru á "Daljanstovu" fáa nú møguleikan at fara í barnagarð í Sørvági. Til hetta verður játtað teimum eyka stuðul eftir § 22 í barnaforsorgarlógini.

Sæð út frá einum sosialpedagogiskum sjónarmiði er tað stimbrandi fyri báðar partar, at børn við breki eru í vanligum dagstovni.

Hetta hevur eisini verið meginreglan innan fólkaskúlaøkið, at brekaði børn verða integrerað í vanliga fólkaskúlan. Vit hava nógv dømi um, at hetta var rætt at gera.

Fýra onnur menningartarnað børn eru í Vágum, tey eru í skúlaaldri. Serkøn meta tað ikki vera ráðiligt, at hesi børn fara í barnagarð millum onnur børn í aldrinum 3-7 ár eftir lokna skúlatíð.

Í sambandi við hesi viðurskifti var fundur í Sørvági 20. januar 1994. Her møttu umboð fyri Sørvágs kommunu, stýrisformaðurin fyri barnagarðin, leiðarin á barnagarðinum, umboð fyri Almannastovuna og Andveikravernáina.

Her kom fram, at Sørvágs kommuna er komin við uppskoti um at leiga eini sethús, sum liggja beint við barnagarðin. Ætlanin er, at útreiðslurnar, ið standast av hesum skulu ganga inn í roknskapin hjá barnagarðinum. Útreiðslan hesum viðvíkjandi verður býtt sambært § 43, stk. 1 í barnaforsorgarlógini.

Ætlanin er so, at skúlabørnini koma til stovnin eftir lokna skúlatíð við neyðugum stuðli. Hesin stuðul verður játtaður sambært barnaforsorgarlógina.

Ætlanin hjá Sørvágs kommunu er, at í næstum verður umsókn send Almannastovuni um at hækka játtanina samsvarandi eykaútreiðslum, somuleiðis verður søkt um at hækka normeringina við 5 børnum (frá 20-25 børn), og søkt verður eisini um, at stovnurin kann taka børn inn í aldrinum 3-18 ár.

Sørvágs kommuna ætlar nú at taka upp samráðingar við eigaran um evt. leigu. Arbeitt verður fram ímóti, at hetta kann setast í verk skjótast tilber.

Um hetta skal kunna lata seg gera er neyðugt, at eykaútreiðslurnar verða hildnar innan fyri ásetta fíggjarkarmin, sum ásettur fyri fíggjarárið 1994 viðvíkjandi rakstrarstaði 19631:dagstovnar. Mett verður, at hetta ber til við givnu játtan, m.a. tí at dagstovnaøkið er minkað, og onkur dagstovnur er heilt givin at virka. Vert er at undirstrika, at játtanin í ár er óbroytt í mun til í fjør. Eftir fyribils kanningum verður talan um eina minni upphædd til henda partin av tiltakinum.

Partarnir á fundinum 20. januar 1994 komu eisini ásamt um, at rætt var at seta á stovn eina døgnumlætting. Umlættingin verður skipað soleiðis, at Almannastovan leigar seg inn í barnagarðin tvey vikuskifti um mánaðin. Pláss verður fyri umleið 4-5 fólkum hvørja ferð.

Døgnumlættingin skal so rinda ljós og hita, men onga leigu. Barnagarðurin sendir so síðani Almannastovuni rokning hesum viðvíkjandi.

Ætlanin hjá pørtunum er, at umlættingin verður sett í verk 1. mars 1994, og at umlættingin verður frá fríggjadegi kl. 18.00 til sunnudag kl. 18.00.

Útreiðslurnar av døgnumlættingini verða mettar til umleið 300.000.- kr.

Almannastovan kannar í løtuni, um møguleiki er at fíggja hetta innan játtanina til rakstrarstað 19047 "Andveikraverna, bústovnar". Lindiliga verður málið lagt fyri landsstýrið til støðutakan.

Við hesum eru teir báðir fyrstu spurningarnir svaraðir, so tíðkiliga sum hetta kann gerast, nevniliga við ítøkiligum ætlanum.

Triði spurningurin var, um nær landsstýrið ætlar at útvega íbúðarmøguleikar til menningartarnaði á smærru oyggjunum.

Í hesum fíggjarári er ætlanin í Suðuroynni at útvega eitt umlættingarheim/bústovn fyri menningartarnaði. Avsettar til endamálið eru 1.5 mió. kr., og er ein fyrireikingarbólkur settur av landsstýrinum.

Rímiligt hevði verið, at Vágarnar ella Norðstreymoy fáa hetta tilboð í 1995.

Men greitt er, at tíltøk eisini av hesum slagi, í seinasta enda snúgva seg um at útvega fígging. Við búskaparstøðuni í huga eru útlitini ikki at teim bestu, men kunnu vit av og á laða onkran nýggjan varða, so gongur hóast alt rætta vegin.

100-5 Ásetan av "hungursmarki"

Ár 1993, týsdagin 23. november boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, frá Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

Hvar metir Føroya landsstýri, at hungursmarkið liggur í krónuvirði fyri eitt vaksið fólk/eina familju við 2-4 børnum í landi okkara?

Viðmerkingar:

Einstakligar og mangar familjur hava tað sera trupult í hesum døgum.

Mong eru tey, sum alt ikki fáa endarnar at røkka.

Tá skattur er goldin og bankarnir kanska hava fingið sítt, er lítið eftir til mat, klæðir og annað neyðugt í húsarhaldinum.

Í roynd og veru er tað minst eftir til mat og klæðir, tá ið oiju- og el rokningin er goldin.

Hitt almenna hevur skyldu til at veita øllum hjálp, ið ikki eru før fyri at vinna sær og sínum til lívsins uppihald.

Endamálið við forsorgarlógini er, at fólk ikki skulu líða hungur og hall, og hevur henda hjálp í krónuvirði ligið á sama støði sum vanlig fólkapensión. Hetta, tí hildið varð, at fólk ikki kundu klárað seg við minni.

Í dag er tað ein sannroynd, at mong hava verið noydd at klára seg við minni, ið hvussu so er í mun til tær neyðugu húsarhaldsútreiðslurnar hjá einum húski.

Einstaklingar og familjur flyta í hópatali av landinum, tí tey ikki klára at lívbjarga sær her á klettunum. Ella sagt á annan hátt, at fíggjarliga tilveru grundarlagið er tikið undan teimum - hungursmarkið er nátt!

Tað kann væl vera, at tað í fyrstu syftu er ein sparing fyri landskassan, at fólk soleiðis flytur av landinum, men er tað ein vandamikil gongd fyri tjóðina og framtíðina hjá hesum samfelag. Tí má alt gerast, sum gerast kann, fyri at steðga hesi gongd.

Við tí ábyrgd, sum tað almenna hevur, má landsstýrið hava gjørt sær greitt, hvar minsta markið fyri fíggjarliga tilverugrundarlagnum í landinum liggur.

Fyri at fáa at vita hetta, verður spurningurin reistur.

Við 21-0 atkvøðum varð tann 25. november samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

25. januar 1994 svaraði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður soleiðis:

SVAR

Í fyrispurninginum verður hugtakið hungursmark nýtt sum eitt sera ítøkiligt hugtak. Tað verður beinleiðis biðið um at fáa ásett hungursmarkið í krónuvirði. Meira ítøkiligt kann tað neyvan gerast.

Men ein avgjørd treyt fyri, at svarið kann verða nøktandi er, at spyrjari og svarari leggja sama týdning í hugtakið hungursmark.

Hvørki í spurninginum ella í viðmerkingunum kemur spyrjarin inn á, hvørja allýsing av hungursmarkinum, hann hevur hugsað um. M.a. verður sagt í viðmerkingunum: "Tá skattur er goldin, og bankarnir kanska hava fingið sítt, er lítið eftir til mat, klæðir og annað neyðugt í húsarhaldinum." Hetta peikar á eina ávísa raðfesting av útreiðslunum, har útreiðslurnar til mat, klæðir og annað koma eftir, at bankarnir hava fingið sítt.

Uttan at vera heilt samdur í hesi raðfesting av útreiðslunum í tí føri, hungursmarkið er

aktuelt, so verður neyðugt at lýsa hugtakið og gera eina raðfesting. Eisini er neyðugt at taka dagar imillum rimiligar útreiðslur og tær útreiðslur, sum áseta eitt hungursmark.

Um sagt verður um ein persón, at viðkomandi livir á hungursmarkinum, so má takast fyri givið, at útreiðsluøkið er tað mest neyðuga til lívsins uppihald. T.v.s. útreiðslur til mat, klæðir, tak yvir høvdið, hita og ljós. Harafturat má so takast nakað til aðrar útreiðslur.

Við øðrum orðum eiga tá ikki útreiðslur at takast við sum til t.d. telefon, útvarpsgjald, sjónvarpsgjald og bilútreiðslur. Hóast hesar eru rimiligar útreiðslur, kunnu tær neyvan takast við, um hungursmarkið skal skiljast sum eitt veruligt hungursmark.

Hetta verður sagt til tess at undirstrika, hvussu torført tað er at seta krónuvirði á eitt hugtak, sum ikki hevur eina allýsing, men mest verður brúkt á mannamunni, nærtan sum best ber til. Hvist eisini í, um spyrjarin hevur gjørt sær hesi viðurskifti púra greið.

Av góðum grundum so hevur hugtakið hungursmark ikki merkt okkara gerandisdag og okkara almannalóggávu. Hungursmarkið var eitt hugtak, vit brúktu um tey fátæku londini, meðan vit í vesturheiminum, og tað serliga í norðanlondum vóru á einum heilt øðrum støði.

Spurt hevur verið í danska almannaráðnum, um teir har hava eitt sokallað hungursmark. Svar teirra var:

> "Imod forventning har vi desværre ikke nogle skriftlige svar på spørgsmålet om suitegrænsen. Det er imidlertid Socialministeriets opfattelse, at der ikke bør ydes hjælp lavere end kontanthjælpniveauet efter bistandsloven. Det er samtidig vores opfattelse, at det må være op til de færøske myndigheder at fastsætte, hvad der må forstås som suitegrænsen på Færøerne."

Aðalendamálið við okkara almannalóggávu er, at eingin av landsins fbúgvum skal líða hungur og hall. Men at fara frá tí støði, vit hava livað á og so á eitt støði, sum kann kallast rímiligt, er eitt langt lop. Men so at fara niður á eitt støði, har vit júst ikki líða hungur og hall, tað er eitt risalop.

Størsti trupulleikin hjá okkara medborgarum, sum vegna arbeiðsloysi ella aðra orsøk søkja sær hjálp gjøgnum almannalóggávuna, eru tær ovurhonds stóru húsaútreiðslurnar, tey flestu sita við.

Tá ið spyrjarin raðfestir húsaútreiðslurnar fram um matútreiðslur, so er tað kanska ikki heilt av tilvild. Hetta hevur verið vanlig hugsan, at húsaútreiðslurnar skuldu gjaldast fyrst, so fekk man at síggja, hvat eftir var.

Men tað er greitt, at tað finst ikki nakra staðni í heiminum tann almannalóggáva, sum nøktar allar tær útreiðslur, sum fólk hava sett seg fyri.

Sum tað seinni kemur at framganga av tølunum yvir almannaveitingar, sum veittast kunnu í dag, so er ein høvuðstrupulleiki, at okkara almannalóggáva als ikki er smíðað við tí fyritreyt, at fólk, sum tørva almannahjálp, yvirhøvur hava so ovurhonds høgar húsaútreiðslur, sum veruleikin hjá nógvum familjum er í dag.

Tað gerst nú alt meira neyðugt hjá fólki, sum enn eru í vinnu, at fáa gjørt nýggjar avtalur um

afturgjalding av húsalánum, tess meira neyðugt verður tað fyri tey, sum fyri styttri ella longri tíðarskeið fáa stuðul eftir t.d. forsorgariógini ella sum fáa arbeiðsloysisstuðul frá Arbeiðsloysisskipanini at gera seravtalur við lánveitararnar, so at familjuni verður tryggjaður peningur til tær neyðturviligu útreiðslurnar sum mat, klæðir, ljós og hita.

Vit mugu kunna krevja av teimum, sum fíggja okkara sethúsamarknað, at teir skilja hesi viðurskifti, soleiðis at t.d. hesi mongu, sum í dag eru arbeiðsleys, fáa seravtalu, sum leggur húsaútreiðslurnar á eitt støði, at familjuni verða tryggjað manssømilig kor. T.v.s. at tað verður neyðugt hjá lánveitarunum t.d. at fastfrysta lán ta tíð, støðan hjá eini familju er, at tey t.d. fáa almannaveiting.

Landsstýrið hevur gjørt peningastovnunum hesa støðu almannaverksins greiða.

Støðan á føroyska sethúsamarknaðinum er nógv øðrvísi enn eitt nú í Danmark. Vit hava flest okkara sett okkum fyri egin hús, og tí loysir tað ongan trupulleika, at ein familja fer úr egnum húsum í onnur, tí lániskuldin frá gomlu húsunum hongur við.

Í Danmark har ein hópur av fólki leiga íbúð alt teirra lív, er støðan munandi øðrvísi. Um leigan er ov høg, so ber til at royna at finna eina búligari íbúð.

Eisini kann tykjast ov mikið, at bankarnir fyrst eru bjargaðir gjøgnum almennar lántøkur, og at tað almenna síðan gjøgnum almannaveitingar skal tryggja teimum øll lánsgjøldini.

Samanumtikið skal tí sigast, at skuldi hungursmarkið verið aktuelt, so má raðfestingin verða tann, at húsaútreiðslurnar (t.v.s lánsgjøld) mugu raðfestast seinni enn útreiðslur til eitt nú mat, klæðir, el og hita.

§ 13, stk. 1 í forsorgarlógini ásetur, at persónar, sum varandi hava tørv á almennari hjálp, eiga at hava eina upphædd svarandi til fólkapensjónina at ráða yvir, og er veitingin til arbeiðsleys eftir § 9, stk. 3 í forsorgarlógini sett samsvarandi hesum.

Landsstýrið hevur leiðbeinandi ásett, at av fulla fólkapensjónsupphæddini eiga í mesta lagi 40% at fara til húsaútreiðslur (ljós, hita og húsalán/húsaleigu). Við øðrum orðum, at í minsta lagi 60% av fólkapensjónsupphæddini eiga at vera eftir til uppihaldsútreiðslur so sum mat, klæði og aðrar gerandisvørur.

Vert er at leggja til merkis, at hetta er eitt leiðbeinandi skriv til umsitingina av almannalóggávuni. Henda leiðbeining er neyðug, tí sambært § 9, stk. 4 er heimild til í serstøkum førum at gera undantak frá ásetingini um hámørkini fyri veitingini vegna m.a. arbeiðsloysi, soleiðis at hjálpin kann verða hægri enn hámarkshjálpin eftir stk. 2 og 3 (sjúkradagpeningahámark ella fólkapensiónshámark). Treytin er tá, at talan skal vera um sera trupul viðurskifti, óvanliga stórar uppihaldsskyldur ella høgar húsaútreiðslur.

Í krónuvirði eru veitingarnar eftir § 13, stk. 1 og § 9, stk. 3 í forsorgarlógini sum ásett niðanfyri.

Um mánaðin, um ongin onnur inntøka er:

Einsamallir persónar: 3.982 + 735 = **4.717 kr.**

Sambúgvandi (giftur) persónur: 3.164 + 584 = **3.748 kr. hvør.**

Familja við 2 børnum: 3.748 x 2 + 669 x 2 = **8.834 kr.**

Familja við 4 børnum: 3.748 x 2 + 669 x 4 = **10.172 kr.**

Ein einsamallur persónur, ið livir av forsorgarhjálp orsakað av arbeiðsloysi, hevur, vísandi til leiðbeinandi skrivið, eftir hesi meting eina upphædd eftir til **bústað** uppá umleið 1.900 kr. um mánaðin og til mat og klæði o.u. 2.830 kr., meðan ein familja við 2 børnum, har báðir uppihaldararnir eru arbeiðsloysir, hevur umleið 3.000 kr. til húsaútreiðslur og 5.830 kr. til mat, klæði o.a. Um familjan býr einsamøll í egnum sethúsum, kann roknast við, at umleið 1.400 kr. fara til ljós og hita.

Undirstrikast skal, at býtið millum húsaútreiðslur og útreiðslur til mat, klæði o.a. er tit frá einum leiðbeinandi skrivi til umsitingina. Endaliga býtið verða fólk sjálvi at gera av. Raðfestingin er eisini persónlig men verður hon kanska gjørd í samráð við peningastovnarnar, soleiðis at tær neyðturviligu útreiðslurnar verða raðfestar fremst.

Veiting til ung undir 24 ár, ið ikki hava uppihaldsskyldur, er sett á sama støði sum lestrarstuðul og lestrarlán til fólk í útbúgving. T.v.s. 2.586 kr. og 3.341 kr. um mánaðin til ávikavist heima- og útibúgvandi.

Umframt framhaldandi veitingina er møguleiki at fáa hjálp eftir § 15. stk. 1 í forsorgarlógini til neyðugar og rímiligar stakútreiðslur, um so er, at persónurin ella familjan einans hava omanfyri nevndu upphæddir eftir til mat, klæði o.a.

Sum dømi um tílíkar stakútreiðslur kunnu nevnast útreiðslur til tannviðgerð, brillur, pinkubarnaútstýr, umframt ávísar varandi nýtsluvørur í serligum førum.

Tær veitingar, her eru nevndar, eru vanligu útgjaldingarnar sambært § 9, stk. 3 og § 13, stk. 1 í forsorgarlógini. Veitingar til fólk, ið eru sjúk, eru vanliga hægri (sjúkradagpengar, sum eru 80% av vanligari arbeiðaraløn er hægsta upphæddin).

Ein samaubering við donsk viðurskifti.

Bistandslógin:

Í § 37 í bistandslógini - samsvarandi § 9 í forsorarlógini - er **grundarveitingin**, ætlað til **mat, klæði** o.a. pr. 1. juli 1993 3.002 kr. um mánaðin, niðursett til 2.641 kr., um hjálpartíðarskeiðið fer út **um 9 mánaðir.**

Omaná hesa upphædd koma so **barnaviðbøtur**, ið eru 1.158 kr. um mánaðin fyri hvørt barnið, umframt viðbót til **Bústaðarútreiðslur** (individuelt).

Tó verður samlaða veitingin avmarkað av, at hon ikki vanliga má fara uppum **90% av nettoinntøkuni** frammanundan hjálpartíðarskeiðnum.

Um so er, at tørvurin (grundarveitingin + barnaviðhøtur + bústaðarviðbót) fer upp um nettoinntøkuna frammanundan, og samstundis er hægri enn 5.723 kr. (1.7.93), verður veitingin 5.723 kr. Hetta er eitt sokallað **"grænsebeløb"**, ella eitt slag av minstuupphædd fyri persónar við uppihaldsskyldum og bústaðarútreiðslum.

Eitt rímiligt danskt familjubudgett:
Vit hava í Føroyum ongar kanningar at byggja á, tá metast skal meiri ágreiniliga um livikostnaðin hjá fólki.

Danska brúkarastýrið (Forbrugerstyrelsen) hevur í ár í tíðarriti sínum (Råd og resultater, særnr. juni, Forbrugerstyrelsen 1993) sett upp eitt yvirlit yvir eitt, eftir donskum viðurskiftum **"rimelig budget"**. Sagt verður, at útrokningarnar hvørki eru fyri hann, ið livir á hungursmarkinum ella fyri hann, ið livir í "luksus".

Budgettið er grundað á eina stóra nýtslu av liðugtvørum og tænastum, tá roknað verður við, at vaksnu persónarnir eru útiarbeiðandi. Talan er ikki um dýrar merkivørur, men heldur ikki um "discount". Prísirnir eru í høvuðsheitunum innsavnaðir frá stórum landsdekkandi handilsketum.

Nýtslu av egnum vørum frá djórahaldi, fiskarí, eplavelting, urtagarðsrøkt o.t. verður í kanningini hjá brúkarastýrinum ikki roknað við, eins og roknað heldur ikki er við serligum kunnleika til seyming, umvæling av bili o.a.

Uppí mat og drekka er roknað eitt nú sodavatn, øl og vín, og einans fáar vørur eru tilboðsvørur.

Klæði og skógvar umfata eisini svimjiklæði, klæði til "fint", summarskógvar og stilvar, eins og skúlataska, taska til vaksin og ur eru roknað uppí. Roknað verður ikki við, at klæði "arvast" ella at klæði verða seymað.

Uppí persónliga røkt verður, umframt vanligar vørur sum sápu, tannkrem, hárvaskievni, o.t. eisini roknað prevention, vitamin- og høvuðpínutablettir, tanneftirlit og -reinsing, hárfríðkan, sólbrillur og brillur til vaksin.

Út frá hesum siggjast rímiligar mánaðarligar útreiðslur hjá eini danskari **familju við 2 børnum**, har foreldrini eru í aldrinum 30-49 ár og børnini eru millum ávikavist 3-6 og 7-10 ár, sambært brúkarastýrið, soleiðis út:

Matur og drekka: 4.143 kr.
Klæði og skógvar: 1.684 kr.
Persónlig røkt: 811 kr.
Gerandisvørur (vaskievni, toilettpappír o.t.): 382 kr.
Tilsamans: **7.020 kr.**

Einsamallur maður, 30-49 ár:

Matur og drekka: 1.397 kr.
Klæði og skógvar: 467 kr.
Persónlig røkt: 288 kr.
Gerandisvørur (vaskievni, toilettpappír t.d.): 197 kr.
Tilsamans: **2.349 kr.**

Harumframt koma so aðrar útreiðslur, so sum útreiðslur til bústað, varandi nýtsluvørur, frítíðarvirksemi, ferðing, barnaansing o.a.

Men sum sagt, her er talan um rímiligar útreiðslur.

Um prísirnir í Føroyum og Danmark á vanligum húsarbaldsvørum verða samanbornir, so er greitt, at hesir eru bíligari í Danmark. Men so eiga nógvir føroyingar tann fyrimun í mun til danir, at enn ber til at útvega ókeypis døgurðamat í Føroyum.

Lánsgjøldini til hús í Danmark eru eisini bíligari enn í Føroyum.

Ein kanning av somu viðurskiftum í Føroyum kann ikki gerast í eini handavending. Hvør skuldi gjørt hana: Prísráðið, Fróðskaparsetrið, Hagstovan ella Almannastovan?

Ein greið niðurstøða er tó, at húsaútreiðslurnar gera tørvin hjá fólki sera ymiskan. Har summi kunnu klára seg við eini veiting, kunnu onnur als ikki, um ikki ein avtala verður gjørd við lángevaramar. Men í flestu førum tykist hetta at vera ein treyt.

Eisini má tað vera ein greið niðurstøða, at vanligi hugburðurin, at húsaútreiðslurnar (lánsgjøldini) skulu raðfestast fremst, eigur at vera broyttur, soleiðis at fólk við seravtalum við peningastovnarnar eiga pening, sum tryggjar familjuni manssømilig kor.

Nú vit fáa eina rammulóg fyri alt almannaøkið, so letur hetta nú upp fyri møguleikanum, at vit nú veruliga fáa lagt okkara lógarøki soleiðis til rættis, at hetta samsvarar føroyskum viðurskiftum. Men ein hækking av veitingunum merkir nú, síðan allar veitingar á almannaøkinum liggja í heildarveitingini, at hækkaðar útreiðslur bert verða fíggjaðar á okkara egnu fíggjarlóg. Her má sigast, at útlitini við verandi búskaparkreppu ikki eru at teim bestu til eina meira ella minni generella hækking av veitingunum.

Landsstýrið er tó av teirri áskoðan, at uppihaldshjálpin eftir forsorgarlógini tryggjar, at persónar, sum eru í fíggjarligari trongstøðu, við fólkapensjónsupphæddini (og evt. barnaviðbót) hava eitt krónuvirði at ráða yvir (tá evt. lánsgjøld samhært eini avtalu eru niðursett), ið dekkar tað mest neyðuga til lívsins uppihald.

Sostatt metir landsstýrið, at fólkapensjónsupphæddin liggur omanfyri eitt møguligt hungursmark.

100-6 Út- og umbygging av flogvallarfarstøðini

Ár 1993, hósdagin 25. november boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi frá Svend Aage Ellefsen, løgtingsmanni, til Signar á Brúnni, landsstýrismann, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

1. Verður framvegis arbeitt við málinum at víðka og umbyggja farstøðina við flogvøllin?

2. Nær kann væntast at farið verður undir byggingina?

Viðmerkingar:

Vegna seinasta landsstýrið avráddi undirritaði við danska ferðslumálaráðharran Kaj Ikast, at farstøðin við flogvøllin skuldi víðkast og umbyggjast.

Sum grundgeving varð m.a. framført, at landsstýrið ætlaði at geva rúmd til taxfreesølu og útvega hóskandi framsýningarhøli til føroysku framleiðslu og ferðamannavinnuna.

Sum nevnt varð málið fyrst viðgjørt saman við ferðslumálaráðharranum, og varð síðan við hansara medvirkan gjørd avtala millum landsstýrið og stjóran fyri Statens Luftfartsvæsen í Tinganesi hin 5. mai 1992.

Eftir fundin 5. mai fór flogvallarleiðslan undir fyrireikingararbeiði og vitjaði í hesum sambandi flogstøðina í Keflavík í Íslandi m.a.

Tax-freesølan kundi soleiðis verðið eitt munagott ískoyti til raksturin av føroyska flogfelagnum.

Hin 15. februar í ár var aftur fundur í Tinganesi millum landsstýrið, flogvallarleiðsluna og arkitektin hjá teimum, og varð nú boðað frá, at ætlanirnar vóru komnar so langt, at ítøkiligt byggiuppskot kundi verða gjørt, so skjótt fortreytirnar viðvíkjandi rakstrinum av taxfreesøluni og virkseminum annars av útbygdu farstøðini, vóru avkláraðar.

Tá landsstýrið var umskipað í vár, kannaði fyrisitingin, um samsvar var millum tollløggávuna og rúsdrekkalógina, so taxfreesølan eisini kundi fevna um sølu av rúsdrekka.

Tað var ætlanin hja undirritaða, at landsstýrið leigaði høllini frá Statens Luftfartsvæsen, og síðani framleigaði aftur til føroyska flogfelagið, sum kundi reka sølubúðirnar. Tax-freesølu av rúsdrekka kundi flogfelagið tikið sær av vegna Einkarsøluna, ið sum kunnugt hevur einkarrætt sambært rúsdrekkalóggávuna.

Óli Breckmann, fólkatingsmaður, setti í mai mánaða nýggja danska ferðslumálaráðharranum Helge Mortensen fyrispurning viðvíkjandi útbyggingini av farstøðini og heitti samstundis á donsku stjórnina at seta tey arbeiði, sum lógu fyri framman hjá stjórnini í Føroyum í gongd sum skjótast.

Hóast Helge Mortensen játtaði (avrit av svarinum varð sent landsstýrinum), at hann stóð við avtaluna, sum Kaj Ikast og undirritaði gjørdu, og hóast Færøernes Kommandø, sum kunnugt, síðani er farin undir bygging av støðuhúsi til sjóverjutyrluna, so hoyrist einki um, nær farið verður undir víðkan og umbygging av farstøðini.

Havandi í huga, at her er talan um eina skilagóða og náttúrliga íløgu, sum verður fíggjað við peningi uttanífrá, og havandi í huga tað stóra arbeiðsloysið, sum serstakliga ger seg galdandi innan byggivinnuna, heldur undirritaði, tað vera spell, at ikki verður farið undir hetta arbeiðið, ið tóktist liggja so greitt fyri.

Nú so langt er fráliðið uttan nakað ítøkiligt er hent, ynskir undirritaði svar upp á omanfyristandandi spurningar.

Við 22-0 atkvøðum varð 2. desember 1993 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

20. januar 1994 svaraði Signar á Brúnni, landsstýrismaður, soleiðis:

SVAR

Í sambandi við fyrispurningir frá Sv. Aage Ellefsen skal verða upplýst, at stutt eftir at sitandi landsstýri varð valt, setti fólkatingsmaðurin Óli Breckmann fyrispurning á Danatingi til danska ferðslumálaráðharran um bygging av farstøðini við flogvøllin í Vágum. Danski ferðslumálaráðharrin svaraði, at málið var avgreitt av donum og sent Føroya landsstýri til endaliga avgreiðslu. Við øðrum orðum hevði fólkaflokkurin fingið málið til viðgerðar í undanfarnu samgongu, men eydnaðist tað ikki at táa avgreitt málið. Løgtingsmaðurin Svend Aage Ellefsen, sum umsat hetta málsøki í undanfarna landsstýri, reisir nú málið aftur.

So skjótt hetta landsstýri varð valt, varð farið at arbeiða víðari við málinum at kanna møguleikarnar at víðka og umbyggja farstøðina við flogvøllin, og hevur landsstýrið í hesum sambandi hildið fundir við umboð fyri Statens Luftfartsvæsen, Atlantsflog, Rúsdrekkasølu Landsins og arkitektar umframt ymsar deildir á Landsskrivstovuni.

Um lógarheimildirnar er at siga, at heimild er í tolllóggávuni at hava tollfría sølu á farstøðini við flogvøllin. Eingin forðing er heldur í rúsdrekkalóggávuni fyri, at Rúsdrekkasøla Landsins stendur fyri rúsdrekkasøluni, men bjóðar sjálvt søluarbeiðið út.

Harafturímóti heldur landsstýrið, at rúsdrekkalógávan setir ógvuliga strong mørk fyri, hvussu stóran part av vinninginum av søluni, ein møguligur arbeiðstakari kann táa lut í. Hesin trupulleiki hevði kunnað verið loystur við at broytt rúsdrekkalógina.

Her eru tó aðrir trupulleikar, ið ikki eru so lættir at loysa.

Nevnast skal, at útreiðsluruar av at selja tollfríar vørur á farstøðini, eru størri enn um selt verður umborð á flogførunum.

Statens Luftfartsvæsen hevur boðið sær til at byggja hóskandi hølir, sum síðani verða leigað út til endamálið. Leiguupphæddin, ið verður skotin upp, er so mikið høg, at íløgan er goldin aftur við rentu tann 1. juli 1999. Statens Luftfartsvæsen hevur valt hesa dagfesting, tá ES-

reglur, sum banna slíka tollfría sølu, helst koma í gildi.

Landsstýrið metir ikki, at nøktandi trygd er fyri, at meirinntøkurnar av at selja tollfrítt á farstøðini viga upp ímóti teimum meirútreiðslum, sum standast av hesi loysn.

Landsstýrið hevur sjálvandi eisini í huga, hvussu ein slík loysn fer at roynast fyri okkara flogfelag - Atlantsflog. Sakkunnleikin heldur ikki, at tað ber til at láta føroyska felagið fáa einkarrætt at hava søluna á farstøðini um hendi, men at sølan í minsta lagi má verða boðin út millum bæði flogfeløgini - tað føroyska og tað danska.

Landsstýrið hevur, sum longu nevnt, hildið nógvar fundir við Atlantsflog um málið, men felagið er komið til ta niðurstøðu, at undir nevndu treytum í sambandi við nýtslu av einari møguligari útbygging av farstøðini, gerst nettoyvirskotið munandi minni, enn tað er í dag.

Landsstýrið er tó ikki komið heilt á mál í sambandi við nevndu útbygging, men roknað verður við, at innan tríggjar vikur verður endaliga støðan tikin.

100-7 Setan av "forstjóra" í Tinganesi

Ár 1994, týsdagin 18. januar boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi frá Óla Breckmann, løgtingsmanni, til løgmanns, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

1. Hevur sosialistiska samgongan í einum rossahandli í loynd longu avgjørt at seta verandi fiskivinnustjóra sum "forstjóra" í Tinganesi?

2. Er nakað fordømi í øðrum demokratiskum landi um, at ein heil almenn landsfyrisiting verður løgd undir persónliga valdið hjá einum einstøkum byrokrati?

3. Er orsøkin til, at eingin kvalifikatión til forstjórastarvið er kravd í starvslýsingini, t.d. "løgfrøði", "hægri prógv í fyrisiting", "cand. merc" ella búskaparfrøði, hon, at tann persónurin, sum longu í loyndum er settur, er havbiologur ella fiskifrøðingur?

4. Er tað rætt, at verandi leiðari á lønardeild landsstýrisins, eftir duldari avtalu

millum landsstýrisflokkarnar, longu er sett sum komandi fiskivinnustjóri í Tinganesi?

Viðmerkingar:

Til spurning 1: Verandi fiskivinnustjóri hevur sitið oman á føroyskari fiskivinnu síðani fyrst í 70-árunum. Harumframt hevur undirskrift hansara verið at sæð undir fjøld av øðrum landsstýrismálum, frá fyrisitingarlógum líka til barnalívið. Men persónligt framsókni ella politiskt tilknýti (í hesum føri tjóðveldiskommunismu) átti ikki at verið nóg góð kvalifikatión til at útiloka onnur, í aðrar mátar kvalifiseraað fólk, sum umsøkjarar til eitt og hvørt alment starv.

Til spurning 2: Bert í tilfarsskomnum og einaveldislondum ber til hjá einstøkum persónum, uttan demokratiska heimild, at ráða fyri borgum. Í londum við fólkastýri er alt vald spjatt á so nógvar hendur sum tilber, so maktmisnýtsla í minst møguligan mun fer fram. Heldur landsstýrið tað vera ráðiligt at geva einum almennum byrokrati ov nógv persónligt vald, tá hesin hevur verið stovnari og limur í Kommunistiskum Útisetum og agiteraði í Framanum fyri at skifta løgtingið út við "annan ráðandi politiskan stovn"? Tað er umráðandi hjá Føroya fólki at vita, um landsstýrið ætlar sær at savna alt fyrisitingarligt vald í Føroyum í hondunum á hesum eina byrokrati.

Til spurning 3: Flestum kunnugt er akademiskt pappírsprógv í sjálvum sær ikki nøkur borgan fyri góðum persónligum eginleikum. Men vanligt er at seta í starvslýsingar krøv um prógv bæði til tess at eyðlýsa og avmarka, hvat almenni arbeiðsgevarin krevur av skikkaðum umsøkjarum til eitt starv. Av ringum royndum vita vit, at tá eingi kvalifikatiónskrøv eru í almennari starvslýsing, er umsøkjarin longu frammanundan settur eftir politiskum (nærum uttan undantak) sosialistiskum tilknýti. Tí má eitt minstakrav vera, at allir kvalifiseraðir umsøkjarar í landinum hava ein kjans at søkja og at verða settir.

Til spurning 4: Leiðarin á løgnardeildini dugir kanska til sítt verandi starv. Men hevur hon nóg góða hylling á fiskivinnu til at útiluka allar aðrar kvalifiseraðar umsøkjarar til hetta týðandi fyrisitingaliga málsøki, okkara høvuðsvinnu?

Við 25-0 atkvøðum varð 20. januar 1994 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

20. januar 1994 svaraði løgmaður munnliga soleiðis:

SVAR

Fyrsti spurningurin: Hevur sosialistiska samgongan í einum rossahandli í loynd longu avgjørt at seta verandi fiskivinnustjóra sum "forstjóra" í Tinganesi? - Svarið er nei!

Næsti spurningurin: Er nakað fordømi í øðrum demokratiskum landi um, at ein heil almenn fyrisiting verður løgd undir persónliga valdið hjá einum einstøkum demokrati?

Hesum kann eg ikki rættuliga svara, tí eg havi ikki søguligan kunnleika til viðurskiftini alla staðni í verðini. Kann tó siga tað, at orsøkin til at lýst varð eftir forstjóra skal síggjast í

sambandi við landsstýrissamtyktina, har tað varð samtykt at endurskoða og effektivisera umsitingina, bæði centralumsitingina og tað, sum liggur longur úti. Tað er neyðugt um vit skulu fáa nóg gott umsitingarverk fyri so lítlar pengar sum gjørligt.

Triði spurningurin: Er ørsøkin til, at eingin kvalifikatión til forstjórasarvið er krevd í starvslýsingini t.d. løgfrøði, hægri prógv í fyrisiting, cand. merc. ella búskaparfrøði, hon, at tann persónur, sum longu í loyndum er settur, er havbiologur ella fiskifrøðingur?

Landsstýrið metti tað vera neyðugt at specifisera hvørjar uppgávur vóru í starvinum. Í lýsingini verður sagt, at prógv og tær royndir fólk hava, skulu sendast inn í sambandi við umsóknina, og í Føroyum er ikki óvanligt at at søkja eftir teimum hægstu leiðarunum uttan at hefta tað á eina ávísa útbúgving.

Fjórði spurningurin: Er tað rætt, at verandi leiðari av lønardeild landsstýrisins eftir dulðari avtalu millum landsstýrisflokkarnar longu er settur sum komandi fiskivinnustjóri í Tinganesi.

Svarið er nei - eingin avtala er gjørd um nakað.

100-8 Fremjing av lógarbroyting innan landbúnaðin

Ár 1994, týsdagin 18. januar boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi frá Anfinni Kallsberg, løgtingsmanni, til Berg Jacobsen, landsstýrismann, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

Nær ætlar landsstýrið at fremja løgtingssamtykt í løgtingsmáli nr. 34/1992, løgtingsfíggjarlógin 1993, á síðu 14, sum varð samtykt við 17-0?

Viðmerkingar:

Í álitinum til fíggjarløgtingslógina fyri 1993, samtykti Føroya Løgting at áleggja landsstýrinum at fremja lógarbroytingar innan landbúnaðin við útgangsstøði í at strika mjólkastudningin á fíggjarlógini til mjólkarframleiðaran, og ístaðin skuldi mjólkarframleiðarin fáa skuldina hjá festinum í Jarðargrunninum, til fjós-, velti- og rakstrarlán, strikaða.

Nú Mjólkarfelag Búnaðarmanna hevur verið noytt til at áleggja framleiðslukvotu á teir ymisku mjólkarframleiðararnar, er neyðugt at gera omanfyri nevndu sanering, um nýggju fjósini við stórari lánsskuld, skulu hava ein møguleika at halda fram.

Við at fremja hesa umlegging, verða allir framleiðarar settir líka fíggjarliga og rímiligari

verður at áseta mjólkarkvotuna út frá stráfóðurgrundarlagi og økonomisku støddini av einum bruki.

			Flutn.stuðn.		Framl.stuðn.
1990	5.900.000 l.	0/50	2.950.000.00	1/50	8.850.000.00
1991	6.400.000 l.	0/55	3.520.000.00	1/41	9.024.000.00
1992	6.700.000 l.	0/46	3.082.000.00	0/90	8.120.000.00
1993*	6.800.000 l.	0/46	3.128.000.00	0/90	6.120.000.00

*) Mett tøl.

Vit hava fingið eina niðurgongd í eftirspurninginum eftir mjólk, orsakað av búskaparkreppuni í Føroyum.

Hetta hevur ført við sær, at framleiðslan av mjólk er einar 600.000 litrar størri enn nýtslan.

Grundin til, at framleiðslan av mjólk er vaksin seinasta ár, er partvís minkandi prísur pr. liter, og fyri at viga upp ímóti hesum má framleiðslan økjast, og partvís, at tey nýggju fjósini ikki eru komin upp í fulla framleiðslu, av tí at viðsetingin tekur sína tíð.

Fyri at fáa tað fíggjarliga at hanga saman hjá Mjólkarvirki Búnaðarmanna, hevur mjólkarvirkið nú ásett eina mjólkarkvotu (framleiðslukvotu) til hvørt fjós. Hetta saman við minkandi prísum (serliga studningar) ger, at øll tey nýggjastu fjósini ikki hava møguleika at økja sína framleiðslu, og harvið ongan møguleika hava at koma at klára skyldur sínar í framtíðini. Eisini hjá teimum niðurskrivaðu fjósunum kemur at standa á.

Sum nú er, hevur Føroya Jarðarráð ongar heimildir at strika skuld, men kann henda heimild fáast við, at § 12, stk. 6, verður broytt.

Sum skipanin virkar í dag, so lænir Jarðargrunnurin pening til eitt festi, sum Jarðargrunnurin eigur (talan kann vera um eitt fjós), og festarin skal gjalda rentu og avdrátt av hesum lánum. Tá festarin hevur goldið alt lánið aftur, eigur Jarðargrunnurin fjósið. Vert kann vera at leggja afturat, at rentur og avdráttir, goldin til Jarðargrunnin í skattaroknskapinum hjá festarunum skulu viðgerast sum leiga.

Tá henda broytingin er framd, kann játtanin til mjólkaframleiðarar á fíggjarlógini avtakast, og merkir hetta eina sparing upp á góðar 6 mió. kr.

Tí kann sigast, at mjólkarstudningurin til framleiðarar í roynd og veru er ein eykastudul til Føroya Jarðargrunn, sum sambært roknskap 1992 hevur eina eginogn upp á 177 mió. kr.

Í hesum døgum hava vit her á løgtingi havt fleiri uppskot um at heimila almennum grunnum at avskriva lán, sum privat (virkir ella einstaklingar) hava tikið. Her er talan um ein almennan grunn, sum lænir til sín sjálvan.

Út frá tí, ið her er framført, og vísandi til løgtingsmál nr. 34/1992 á síðu 13-14 sambært hjálagda skjal, verða settir frammanfyristandandi spurningar til landsstýrismannin.

Við 26-0 atkvøðum varð 20. januar 1994 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

23. februar 1994 svaraði Bergur Jacobsen, landsstýrismaður soleiðis:

SVAR

Eftir áheitan frá tinggjarnevndini er landsstýrið farið undir at fyrireika lógaruppskot at leggja fyri tingið, soleiðis at Jarðarráðið fær heimild at strika lán veitt úr Jarðargrunninum. Lógaruppskotið verður lagt fyri tingið í hesi tingsetuni.

Landsstýrið metir ikki, at tað loysir nakran trupulleika fyri bøndur, at øll lán til landbúnaðin verða strikað, men heldur eigur at verða hugt at støðuni hjá bóndum í hvørjum einstøkum føri.

Til at fyrireika hetta arbeiðið samtykti landsstýrið á fundi 30. november 1993 at seta eina nevnd at arbeiða við at gera uppskot til landsstýrið viðvíkjandi framtíðar landbúnaðarvinnu í Føroyum.

Nevndin skal fyrst og fremst orða endamálsgreinina fyri vinnuligum jarðarbrúki í Føroyum við tí fyri eyga at umskipa lógarverkið hesum viðvíkjandi.

Nevndin skal greina kappingarstøðið í føroyskum jarðarbrúki, herundir kappingaravleiðandi skipanir her heima og í øðrum londum, sum ávirka hetta.

Nevndin skal eisini umhugsa, hvørjar tænastur eiga at vera til taks, og hvussu tær skulu tíggjast.

Ætlanin er, at hetta arbeiði skal leggja støði undir eini endurskoðan av studningsskipanini, og somuleiðis eini endurskoðan av ognarviðurskiftunum av almennu búnaðarjørðini, so henda í størsta mun verður gagnnýtt og kemur samfelagnum til góðar. Fjós, ið ikki bera seg, eiga at fáa tilboð um at fara undir aðra vinnu, ella at lata aftur.

100-9 Niðurskriving av skuldini hjá veiðiflotanum

Ár 1994, týsdagin 25. januar boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi frá Hans Tausen Olsen, løgtingsmanni, til Finnboga Ísakson, landsstýrismann og Thomas Arabo, landsstýrismann, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

Hvat ætlar Føroya Landsstýri at gera fyri at niðurskrivingin av skuldini hjá veiðiflotanum verður sum mest samfelagsliga gagnlig og rættvís, soleiðis

1) at útróðrarflotin eisini kemur at kenna sín lætta við niðurskrivingini, og
2) at menn, sum halda seg til at bjóða upp á veiðifør, sum ikki bera seg uttan fløgustuðulin, sleppa at bjóða upp á hesi.

Viðmerkingar:

Síðani fiskimarkið varð flutt út í sjeytiárunum og fram til endan av áttatiárunum, hava støðugt fleiri trolarar trároynt leiðirnar innan føroyska fiskimarkið, og haraftrat hava upp móti hálvthundrað smærri trolarar roynt á sjálvum landgrunninum.

Í hesum sama tíðarskeiði er føroyski búskapurin vorðin ovuruppihitaður við fleiri hundraðtals milliónum krónum í uttanlandslánum, sum fyri ein stóran part gjøgnum ymsar stuðulsskipanir eru farnar til hesar somu trolarar.

Somuleiðis eru hesar milliónir farnar til fløgur av flakavirkjum, hvørs framleiðsluorka er væl oman fyri tað, ið veiðiførini megna at flyta til lands.

Gongdin innan fiskivinnuna hevur verið merkt av, at ymsir kapitalbólkar hava kappast um veitingar og trygd úr landskassanum í ólíkum formum m.a. sum veðhald fyri uttanlandslánum.

Ofta hevur persónssamanfall verið millum láns- og veðhaldsmóttakarar innan fiskivinnuna øðrumegin og láns- og veðhaldsgevarar í landsstýri og bankaleiðslu hinumegin.

Hetta nevnda tíðarskeið hevur samanumtikið á mangan hátt verið eitt satt gullnám, serliga fyri kapitalbólkarnar innan trolaraflotan.

Men tíðarskeiðið hevur samstundis verið eyðkent við, at aðrir bólkar í fiskivinnuni hava verið noyddir at hopa undan, serliga útróðrarflotin, sum støðugt hevur verið trokaður av sínum søguligu miðum.

Støðan í dag er m.a. av hesum nevndu ávum tann, at fiskaloysið er so stórt sum nærum ongantíð áður í søguni, at veiðiflotin ber ikki sínar fíggjarligu skyldur, at skattur og avgjøld tyngja alt tað arbeiðandi fólkið, at landskassin er so skuldarbundin sum ongantíð áður, og at arbeidsloysið er so stórt, sum ikki fyrr sæð her á landi.

Tað er skylda okkara á Føroya Løgtingi at virka so fyri, at vend kemur í hesa gongd.

Eitt stig á røttu leiðini er nýliga samtykta lógin um at friða ávísar leiðir kring Føroyar fyri troiveiðu, soleiðis at útróðrarflotin vinnur aftur síni søguligu rættindi og soleiðis, at gýtingarstovnarnir og tann hvíti fiskurin aftur fær ein møguleika at menna seg.

Eitt annað stig, tykist mær, kann vera at endurskoða førda niðurskrivingarpolitikkin í sambandi við veiðiflotan.

Í sambandi við niðurskrivingina av skuldini hjá veiðiflotanum hevur loysnin hjá figgingarstovnunum - og í hesum føri serliga bankanum, sjálvandi - verið at valt nakrar trolaracigarar út, sum teir síðan hava latið fingið eina niðurskriving.

Henda niðurskriving verður partvís gjørd við trygd í løgtingslóg nr. 34, um stuðul til feskfiskaflotan frá 4. mars 1993, tilevnað av táverandi landsstýrismanni í fiskivinnumálum, John Petersen.

Endamálið við lógini varð sagt at vera at minka um veiðitrýstið innan føroyska fiskimarkið, og møguleiki gavst tí fyri at fáa útgoldið eina ávísa upphædd - upp til 1,3 mió. kr., um veiðiloyvið varð latið inn.

Men hesin sonevndi fløgustuðulin verður eisini árliga veittur hvørjum einasta veiðifari, sum er í vinnu, bert treytað av, at landað verður í Føroyum, og at 33% av veiðuni verða seld á uppboðssølu.

Tað er nú so mikið liðið, at Føroya Landsstýri eigur at endurskoða hesa nevndu lóg viðvíkjandi fløgustuðulinum. Serliga tvær orsakir tala fyri tí. Tann eina er, at tey veiðufør, ið kundu havt høvi at nýta lógina til at lata veiðuloyvið inn, hava longu nýtt hana, og hin er, at bankarnir nýta lógina sum trygd fyri at niðurskriva ella fastfrysta lánini í veiðiførunum, sum eru í vinnu.

Hetta merkir við øðrum orðum, at landskassin heldur lív í fleiri av hesum veiðiførum, sum bankarnir síðan vinna uppá.

Hetta er heldur torført hjá teimum at skilja, sum eru tilreiðar í eini fríari tvingsilssølu at bjóða upp á veiðiførini, sum ikki bera seg uttan fløgustuðulin, men sum tó ikki fáa høvi til tað.

At bankarnir føra ein slíkan fíggjarpolitikk er skilligt, tí teir vilja bjarga so nógv av sínum lánum sum gjørligt í hesum veiðiførum, og tá ið nú landskassin stendur við endan, so ber til at finna serliga gjaldstreytir við t.d. at leingja afturgjaldingartíðina. Bankarnir fáa jú ikki eitt oyra afturborið, um hesi veiðifør verða seld á tvingsilssølu, tí tey ikki bera seg uttan fløgustuðulin. Eigararnir eru sum kunnugt skipaðir í felag við bert lítlum eginpeningi.

Eisini í hesum fíggjarpolitikki hjá bankunum verður útróðrarflotin at víkja, tí bankarnir tykjast at halda útróðrarflotan uttan fyri allari niðurskriving. Eisini her verður útróðrarvinnan latin upp til skutils. Útróðurin kann jú altíð fara, tí her eru tað útróðrarmenninir sjálvir, ið veðhalda við húsum og allari ogn fyri bankalánunum. Her missir bankin ikki tað stóra - hann fær so altíð húsini og ognirnar. Soleiðis tykist bankahugsanin at vera.

Vit hava seinastu árini hoyrt nógva talu um, at vinnan skal standa á egnum beinum, at vit skulu lata marknaðarkreftirnar ráða, at teir, ið ikki fáa tað at bera til, mugu lata aðrar sleppa framat, at nú var liðugt við sonevnda loftingarpolitikkinum, at nú var tíðin farin frá privatkommunismuni.

Men spurningurin er, um ikki niðurskrivingarpolitikkurin við trygd í íløgustuðlinum bert er ein nýggjur loftingarpolitikkur - ella gamli loftingarpolitikkurin við nýggjum navni. Tí mugu vit spyrja, um ikki lóg nr. 34 frá 4 mars 1993 um stuðul til feskfiskaflotan ikki hevur havt sína tíð?

Úrslitið av førda figgingarpolitikki - tí almenna og tí privata - er tað, at somu menn, somu partafeløg, sum gjøgnum øll sjeyti- og áttatiárini fingu allar sømdir sýndar frá landskassanum og bankunum - og sum kortini ikki fingu veiðiførini at bera seg - ja, hesir somu menn og feløg sleppa ekkaleysir at halda fram - bert hesa ferð við einum íløgustuðli og eini niðurskriving, hvørs møguleiki er skaptur við milliardalánum úr danska ríkiskassanum til føroyska landskassan við trygd í skatti og avgjøldum hjá Føroya fólki.

Henda støðan er bæði siðamenningarliga og búskaparliga skeiv. Her má vend koma í.

Vit eiga at bera so í bandi, at útróðrarvinnan verður styrkt. Vit vita jú, at tað er ikki útróðrarflotin, ið tyngir landskassan við uttanlandslánum, at tað er ikki útróðrarflotin, ið hevur havt nakra ovveiði á føroyska landgrunninum, at tað er ikki útróðrarflotin, ið hevur ført landið út í búskaparligt óføri - heldur er tað beint tvørturímóti.

Føroya Løgting hevur júst í hesum døgum samtykt lóg um nýggjar friðingarleiðir. Men hvat hjálpir tað at friða gýtingarstovnarnar og tann hvíta fiskin móti trároyning og ránsveiðu trolaraflotans, tá umstøða annars hjá útróðrarflotanum alsamt gerast verri.

Úrslitið verður stutt og greitt tað, at tað verður trolaraflotin, sum kemur at veiða tann fiskin, sum vit í dag hava friðað ímóti trolingini.

Niðurskrivingin av skuldini hjá veiðiførunum skal vera rættvís og samfelagsliga gagnlig.

Við 19-0 atkvøðum varð 25. januar 1994 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast. Fyrispurningurin varð tó ikki svaraður vegna samgonguslit.

100-10 Framtíðarmøguleikar fyri aling á Sørvágsfirði

Ár 1994, hósdagin 20. januar boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi frá Sv. Aage Ellefsen, løgtingsmanni, til Thomas Arabo, landsstýrismann, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

1. Fer landsstýrið at forða, at Sørvágsfjørður verður brúktur sum tiltaksøki hjá uttanbíggjaalarum, ið annars hava framleiðsluøki síni aðrastaðni?

2. Hvussu fer landsstýrið at skipa alingina á Sørvágsfirði í framtíðini?

Viðmerkingar:

Um ársskiftið skrivaði Sørvágs bygdarráð til landsstýrið viðvíkjandi framtíðaralingini á Sørvágsfirði.

Orsøkin til skrivið er, at bygdarráðið av tilvild(!) hevur fingið frætt av, at landsstýrið hevur ætlanir um at forða sørvingum at ala laks á Sørvágsfirði, og í staðin ætlar at leggja økið út til skiftisøki hjá uttanbíggjaalarum!

Tað er alla átalu vert, at landsstýrið hevur slíkar ætlanir, og uppaftur verri er, at landsstýrið í heila tíkið loyvir sær at leggja ætlanir viðvíkjandi Sørvágsfirði, uttan yvirhøvur at tosa við Sørvágs bygdarráð um framtíðina!

Tað er annars ómetaliga nógv fyri at síggja, hvussu niðurbundið vinnulívið í Sørvági er orðið undir sitandi samgonguni!

Flakavirkið í bygdini er stongt og verður neyvan latið uppaftur, so leingi monopolfelagið hjá samgonguni eigur rættin til virkisbygningarnar, hetta sambært stjóranum í nevnda felag sjálvum.

Tað er grátiligt! Serstakliga, tá hugsað verður um, at Sørvágur var undangongubygdin, hvat føroyskari flakavinnu viðvíkur. Sørágs flakavirki var fyrsta flakavirki í landinum!

Tá flakavirkið ikki longur er til, missir útróðurin skjótt flestu av teimum tænastum, sum útróðurin hevur fyri neyðini, um honum skal vera lív lagað. Við flakavirkinum fer soleiðis agngoymslan og agnsølan, har fer stampagoymslan, skipað móttøka av fiskinum, tá komið verður aftur at landi, havnalossikrani o.s.fr.

Greitt er tí, at samgongan, tá hon samdist við ríkisstjórnina um stovnan av monopolfelagnum, samstundis segði deyðadómin yvir útróðurin í Sørvági, einsvæl og í nógvum øðrum útróðrarbygdum í landinum!

Skal nú haraftrat Sørvágsfjørður, sum er eitt hitt besta aliøkið í landinum, latast uttanbíggjafólki við tí til fylgju, at sørvingar bert fáa loyvi at standa á bryggjukantinum við hondunum í buksulummanum og hyggja at, meðan fremmandamenninir gera sær dælt av

almøguleikanum, tá má ásannast, at samgonguflokkarnir bert hava havt ein einasta málsetning Sørvágsbygd viðvíkjandi, og tað er avtofta bygdina.

Í skrivinum vísir bygdarráðið á, at alarar í bygdini, sum hava fígging, bert bíða eftir at sleppa at seta smolt út, men at hesir higartil ikki hava fingið neyðugu loyvini.

Eisini ger bygdarráðið vart við, at Sørvágsfjørður enn er uttan furunkulosusmittu, og heitir á landsstýrið at steðga siglingini við brunnbátum millum øki, ið smittað eru og Sørvág.! Ein og hvør kann ímynda sær, hvat hendir, um brunnbátur pumpar furunkulosusmittaðan sjógv út á Sørvági! So her átti landsstýrið fyri langt síðani at havt tikið neyðugu stigini!

Sambært teimum upplýsingunum, bygdarráðið sigur seg hava fingið, er ætlanin hjá landsstýrinum at fremja umtalaða uppbýtið innan útseting av smolti nú í vár.

Sum løgtingsmaður fyri Vágarnar loyvi eg mær við hesum at máta framferð landsstýrisins og loyvi mær samstundis at seta landsstýrismanninum omanfyri standandi spurningar.

Í hesum viðtanginum skal vera mint á tíðarfreistina, sum tingskipanin gevur landsstýrismanninum at svara fyrispurningi her á tingi!

Við 22-0 atkvøðum varð 1. februar samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast. Fyrispurningurin varð seinni afturtikin.

100-11 Virksemið hjá Kærunevndini í almannamálum

Ár 1994, týsdagin 8. februar boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

Hvat vil landsstýrið gera fyri, at viðgerðartíðin hjá Kærunevndini í almannamálum kann styttast, so at fólk fáa svar skjótast gjørligt og ikki noyðast at bíða til 6 mánaðir eftir, at ummælið er fingið frá Almannastovuni.

Viðmerkingar:

Tá ið Kærunevndin í almannamálum við løgtingslóg nr. 47 frá 23. mars 1993 varð sett á stovn, varð hildið, at hetta fór at bøta um viðurskiftini hjá teimum, ið vóru misnøgd um viðgerðina á Almannastovuni, og stytta um bíðitíðina eftir svari úr landsstýrinum, tá ið kært varð.

Kærunevndin í almannamálum fekk sjálvstøðuga skrivstovu, og landsstýrið setti fólk við løgfrøðiligum embætisprógvi sum fastan skrivara hjá Kærunevndini, ið annars fær ta neyðugu

skrivstovulænastuna frá Landsskrivstovuni.

Men brøvini, ið fólk fáa frá Kærunevndini, uppiýsa, at avgerð verður ikki tikin í kærumálum fyrrenn 6 mánaðir eftir, at ummæli til kæruna er komið frá Almannastovuni. Tað kann taka sína tíð.

Tá ið tað snýr seg um kærumál innan almenna forsorg, er tað átrokandi, at skjótt verður borið at, tí at fólk eru í neyð.

Tey kunnu illa híða ½ ár ella longur eftir svari upp á kærur, sendar eru.

Tá ið landsstýrið var kærustovnur, eydnaðist tað við hvørt í sovorðnum málum at bera skjótt at. Hesin møguleiki er nú burtur um Kærunevndin ikki broytir mannagongd. Hvussu vil landsstýrið loysa hesar trupulleikarnar hjá tí alsamt vaksandi tali av fólkum, ið koma illa fyri og er misnøgt við avgerðirnar hjá Almannastovuni.

Við 15-0 atkvøðum varð ikki samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

100-12 Skeljaveiða á innaru leiðunum norðanfyri og heimild

Ár 1994, týsdagin 15. februar boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, til Thomas Arabo, landsstýrismann, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

Fer skeljaveiða fram á innaru leiðunum norðanfyri og við hvørji heimild, um so er?

Viðmerkingar:

Tað hevur ljóðað, at "Ólavur Hvíti" royndartrolar eftir skeljum á innaru leiðunum norðanfyri, og at "Norðheim" hevur gjørt tað sama.

Fyri nøkrum árum síðani trolaði "Fame" á leiðunum norðanfyri og fekk væl av jákupsskeljum. Útróðrarmenn kendu seg tá órógvaðar og stúrdu fyri avleiðingunum av tílíkari troling, sum teir eisini hava stúrt fyri og framvegis gera tað í øðrum fiskiveiðulondum. Tað er botnurin, ið broytist, og lívið á botni, ið verður órógvað, so at fiskurin fær ilt við at

trívast.

Í fiskivinnunevndini hevur verið umsókn frá monnum, ið hava søkt um stuðul til at trola eftir jákupsskel og taka skeljarnar úr við hond. Landsstýrið samtykti at játta 100.000 kr. til hesa roynd, men umsóknin varð ikki samtykt í fiskivinnunevndini. Formaðurin var einsamallur, ið tók undir við málinum. Tí er tað ikki komið fgjøgnum.

Loyvið til at gera royndir eiga eisini at verða løgd fyri fiskivinnunevnd løgtingsins, men har er eingin umsókn viðgjørd og tí heldur ikki samtykt, so at tað er løgið, um landsstýrið hevur sent bát ella skip út at gera royndir uttan um fiskivinnunevndina. "Norðheim" hevur loyvi til at royna eftir skeljum eystan fyri Nólsoynna, men útróðrarmenn halda seg hava sæð skipið roynt eisini á innaru leiðunum norðanfyri. Tí verður hesin spurningur settur landsstýrinum.

Við 16-0 atkvøðum varð ikki samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

100-13 Príshækkingin á ferða- og flutningsgjaldi við skipunum hjá Strandferðsluni

Ár 1994, mánadagin 28. februar boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, til Signar á Brúnni, landsstýrismann, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

Hvørja heimild hevur landsstýrið til at hækka prísin á ferðaseðlum og flutningi við Strandfaraskipum Landsins, og hvørja heimild hevur prísráðið til at góðkenna tílíka hækking, tá ið lógin um prísstoðg nr. 191 frá 8. desember 1993 eisini er galdandi fyri flutning innanoyggja?

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur boðað frá hækking á prísunum á ferðaseðlum og flutningi við skipunum hjá Strandferðsluni, men løgtingslóg um prísstoðg sigur í § 2: "Fyri flutnings- og tænastuveitingar her á landi kunnu ikki takast hægri prísir, gjøld ella samsýningar enn tað, ið var lógligt galdandi 18. oktober 1993.

Landsstýrið hevur lagt málið fyri prísráðið, sum hevur eftirlit við, at reglurnar í lógini verða hildnar. Sambært § 7, stk. 2, í lógini, kann prísráðið "í serstøkum førum geva undantaksloyvi frá reglunum í §§ 1-6."

Hvørji serstøk føri, her skulu gera seg galdandi, er ilt at vita, tá ið hugsað verður um, at farleiðirnar t.d. við "Ternuni" um Leirvíkarfjørð og við "Sam" um Vestmannasund hava givið nógvar milliónir í yvirskoti.

Eftir § 8 í lógini um prissteðg skal grundarlagið fyri bæði galdandi prísum og hækkingum kunna skjalprógvast, og prísráðið kann lækka prísin, sum ráðið metir samsvarar best við lógina. Men hevur prísráðið heimild til at hækka prísin á t.d. farleiðum, ið frammanundan geva yvirskot?

Stórur partur av Føroya fólki býr og virkar uttan fyri miðstaðarøkið. Hvønn rætt hevur landsstýrið til at gera tað uppaftur truplari fyri tey at samskifta?

Vit eru eitt samfelag við nógvum smáum oyggjum og bygdum, sum hava tikið ímóti so mongum hroðasjógvum. Vit fara at klára okkum ígjøgnum hesar vánaligu tíðirnar eisini, men hvønn rætt hevur landsstýrið til at leggja fleiri byrðar og prishækkingar á fólkið, sum her búleikast? Er landsstýrið ikki sjálvt eisini undirlagt lógum landsins?

Við 28-0 atkvøðum varð 4. mars 1994 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

4. mars 1994 svaraði Signar á Brúnni, landsstýrismaður munnliga soleiðis:

SVAR

Tá fíggjarlógaruppskotið varð framlagt, var játtanin til Strandferðsluna lækkað við 1. mió. kr., samstundis sum vit vistu at Strandferðslan í 1993 hevði eitt hall uppá 6-7 mió. kr. Í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið varð sagt, at landsstýrið ætlaði at fáa pening inn við at hækka gjøldini og tá uppskotið kom fyri á tingi setti ein tingmaður fram uppskot um, at gjøldini ikki skuldu hækkast. Uppskotið fall!

Viðgangast skal, at fíggjarlógaruppskotið við viðmerkingum um prishækkingina var í andsøgn við lógina frá 8. desember um prissteðg, men heimild er í serstøkum førum at geva undantaksloyvi frá reglunum §§ 1-6 og eftir at hava ráðført seg við løgfrøðingar, sendi landsstýrið prísráðnum uppskotið. Prísráðið hevur góðkent uppskotið, men er ikki samt við hvussu hækkingarnar verða framdar og er málið tí sent yvirprísráðnum, har tað er nú. Tíðkil haldi eg, at regluliga er farið fram í hesum málinum.

100-14 Kærur í almannamálum

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

Nær kunnu fólk, sum kært hava um avgerðir hjá Almannastovni vænta at fáa svar og málini avgreidd?

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur verið kærustovnur í almannamálum og er tað fyri ein part framvegis, men við løgtingslóg nr. 47 frá 23. mars 1993 varð sett á stovn Kærunevnd í Almannamálum. Í kærunevndini sita 3 limir, sum landsstýrið hevur valt, ein lækni, ein løgfrøðingur og ein sosialráðgevi.

Harumframt hevur landsstýrið sett eitt fólk við løgfrøðiligum embætisprógvi í nýtt starv sum fastan skrivara hjá nevndini.

Kærunevndin hevur sjálvstøðuga skrivstovu, ið fyrireikar tey mál, sum skulu viðgerast í nevndini, men fær hon annars ta neyðugu skrivstovutænastuna frá landsskrivstovuni. Kærunevndin í Almannamálum tekur sær bara av kærum, ið vóru lætnar inn frá og við 1. apríl 1993. Hinar tekur almannadeildin í landsstýrinum sær av.

Fleiri, ið kært hava, eisini fyri 1. apríl 1993, bíða framvegis eftir svari. Fólk hava frá Kærunevndini fingið at vita, at avgerð fór at verða tikin í nevndini 6 mánaðir eftir, at ummæli var komið frá almannastovuni, sum eisini plagar at taka sína tíð.

Men herfyri varð upplýst í fjølmiðlunum, at Kærunevndin í Almannamálum virkar ikki, tí at ósemja hevur tikið seg upp millum landsstýrið og nevndina um fundarsamsýning v.m.

Tá ið talan er um kærumál innan almenna forsorg, er tað átrokandi, at skjótt verður atborið, tí at fólk eru illa fyri og líða neyð. Tí kann tað ikki vera rætt, at tað fyri tað fyrsta skal bíast í meira enn eitt hálvt ár eftir avgerð og avgreiðslu, og fyri tað næsta at Kærunevndin er uppsteðgað og hildin uppat at virka, soleiðis at eingin nú dugir at siga, nær ið málini verða avgreidd.

Nógv eru illa fyri og misnøgd við avgerðirnar hjá Almannastovuni. Tað tykist, sum Almannastovan í dag gongur eftir væl strangari reglum enn teimum, gingið verður eftir í Danmørk. Har tey, ið vildu kæra, fyrr høvdu landsstýrið at kæra til og viðhvørt fingu skjótt svar, hava tey í dag ongan, ið kann taka avgerð í teirra kærumálum.

Tað er landsstýrið, sum hevur ábyrgdina av, at samtyktir løgtingsins verða settar í verk. Tí verður spurningurin settur landsstýrismanninum í almannamálum. Hetta ber stutt og greitt ikki

til longur!

Við 23-0 atkvøðum varð 22. mars 1994 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

28. apríl 1994 svaraði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður soleðis:

SVAR

Tað hevur neyvan verið uttan orsøk, at tað í fleiri ár hevur verið eitt ynski um, at sett varð ein kærunevnd at viðgera og avgreiða kærur í almannamálum.

Áðrenn Kærunevndin kom, var tað landsstýrið, t.v.s. landsstýrismaðurin í almannamálum, sum var kærumyndugleiki. Hetta var galdandi fram til 1. apríl 1993.

Mannagongdin tá var sum nú, at kærumyndugleikin fekk frá Almannastovuni allar neyðugar upplýsingar til vega, umframt at Almannastovan eisini gjørdi eitt tilmæli. Við m.ø. hesum sum grundarlagi gjørdi umsitingin á landsskrivstovuni eitt tilmæli til landsstýrismannin, sum síðani tók endaligu avgerðina til kæruna. Hetta var antin at staðfesta avgerðina hjá Almannastovuni, ella at broyta hesa. Sigast skal, at í allar flestu førum varð tikið undir við avgerðunum hjá Almannastovuni.

Nú hevur tað sjálvsagt verið ymiskt við hvørjum fortreytum, teir skiftandi landsstýrismenninir hava sitið. Men felags fyri okkum allar er, at eingin okkara hevur verið løgfrøðingur. Frægasta grundarlagið var tá, at brúkt varð "sunn fornuft" uttan at navnið á kæraranum ávirkaði avgerðina.

Umsitingin av okkara almannaverki byggir á eitt rættuliga breitt og heldur fløkt lógargrundarlag. Tí verður tað ein løgfrøðilig meting, um umsitingin á almannastovuni hevur umsitið sambært galdandi lóggávu.

Tí bygdi ynskið um eina kærunevnd í almannamálum á, at best var, um ein faðlig nevnd umsat økið.

Kærunevndin skal sambært løgtingslóg nr. 47 frá 23. mars 1993 veljast við einum løgfrøðingi sum formanni, einum lækna og einum sosialráðgeva. Eingin av limunum skal hava nakað tilknýti til almannaumsitingina. Henda samanseting skuldi givið møguleika fyri einari neyðugari fakligari og óheftari vitan.

Men eins týdningarmikið tað er, at avgerðirnar byggja á fakliga og óhefta vitan, eins týdningarmikið er tað, at avgerðirnar verða tiknar innan fyri eina rimiliga tíð. Men hjá landsstýrinum hevur tað tíverri tikið alt ov langa tíð. Hetta má tí m.a. skyldast, at ov lítil umsitingarlig orka er løgd til hetta økið.

Niðanfyri er eitt yvirlit, sum journalin í Tinganesi hevur gjørt:

Yvirlit yvir viðgerðartíð av forsorgarmálum 1986 - 1992

1986: 7 kærumál
Miðal viðgerðartíð 4 mðr.
Longsta " 12 mðr.
Minsta " 1 mðr.

1987: 8 kærumál
Miðal viðgerðartíð 5 mðr.
Longsta " 22 mðr.
Minsta " 1 mðr.

1988: 35 kærumál
Miðal viðgerðartíð 7 mðr.
Longsta " 20 mðr.
Minsta " 1 mðr.

1989: 19 kærumál
Miðal viðgerðartíð 7 mðr.
Longsta " 15 mðr.
Minsta " 1 mðr.

1990: 35 kærumál sb. forsorgarlógini
Miðal viðgerðartíð 11 mðr.
Longsta " 43 mðr.
Minsta " 1 mðr.

1990: 6 kærumál sb. pensjónslógini
Miðal viðgerðartíð 7 mðr.
Longsta " 18 mðr.
Minsta " 1 mðr.

1991: 88 kærumál sb. forsorgarlógini
Miðal viðgerðartíð 9 mðr.
Longsta " 31 mðr.
Minsta " 1 mðr.

1991: 18 kærumál sb. pensjónslógini
Miðal viðgerðartíð 7 mðr.
Longsta " 25 mðr.
Minsta " 1 mðr.

1992: 53 kærumál sb. forsorgarlógini
Miðal viðgerðartíð 10 mðr.
Longsta " 24 mðr.
Minsta " 1 mðr.

1991: 5 kærumál sb. pensjónslógini

Miðal viðgerðartíð		10 mðr.
Longsta	"	22 mðr.
Minsta	"	3 mðr.

Ikki liðug mál

1990	2 mál
1991	6 mál
1992	79 mál

Í løtuni liggja samanlagt 104 kærur í landsstýrinum, sum enn ikki eru avgreiddar.

Í skrivi dagfest 29. mars 1994 frá Dorte Decker, sum tá var fulltrúi hjá Kærunevndini, verður m.a. sagt, at í løtuni er málsviðgerðartíðin uml. 6 mánaðir frá tí, at kæran er móttikin, til ein avgerð er tikin. Annars er mannagongdin stórt sæð tann sama, sum tá landsstýrið var kærumyndugleiki. Ikki ber til hjá Kærunevndini at avgreiða eina kæru, uttan at myndugleikin, ið tikið hevur avgerðina, hevur givið eitt ummæli og eina grundgeving við neyðugum ávísingum til lógargrundarlagið.

Víðari verður sagt, at tað eigur at bera til at seta tíðina niður úr 6 í 3 mánaðir; hetta tí at 1. januar 1994 fingu vit lóg um almenna fyrisiting og lóg um alment innlit. Hesar siga, at avgerðir skulu grundgevast og innihalda ávísingar til greinir í lógum, kunngerðum og reglugerðum, sum hava verið grundarlagið fyri avgerðini.

Higartil hevur Almannastovan hvørki grundgivið ella víst til lógargrundarlagið. Men tað ummæli, sum Kærunevndin fær frá Almannastovuni, inniheldur tað, sum umsøkjarin eisini hevur krav uppá.

So nú skulu málsviðgerðarar grundgeva avgerðina og eisini vísa á, um umsøkjarin kanska hevur aðrar møguleikar fyri, at hjálp kann veitast.

Víðari greiðir fulltrúin frá, at fólk, ið síggja og skilja, hví eitt avslag er givið, hava ikki so nógv fyri neyðini at kæra. Haraftrat noyðist málsviðgerðarin, tí at hann skal grundgeva avgerðina, at brúka røttu lógarregluna. Hetta vil føra til rættari og tryggari avgerðir.

Tá ið so Kærunevndin skal hava upplýsingar í einum kærumáli, har avgerðin er væl grundgivin, hevur Almannastovan bert fyri neyðini at boða frá, um nakað nýtt er at viðmerkja.

Alt hetta vil sela málsviðgerðartíðina niður í helvt, og uttan iva vil talið av kærum falla.

Tíðin fyri kæruviðgerð í Danmark í "Den sociale Ankestyrelse" var í 1992 umt. 7 mðr., men eru teir í 1993 komnir niður á 6 mánaðir. Teirra mál er at koma niður á 3 mánaðir um ikki ov nógv ár.

Tíverri segði fulltrúin hjá Kærunevndini seg úr starvi pr. 1. apríl 1994, men landsstýrið hevur lýst eftir nýggjum fulltrúa, og tá ið umsóknarfreistin var úti, vóru 22 umsóknir.

Áðrenn Dorte Decker fór úr starvi, handaði hon landsstýrinum og Almannastovuni eitt yvirlit yvir øll tey mál, ið nevndin hevur viðgjørt og tikið avgerð í. Hetta er eitt yvirlit, sum týðiliga sigur frá, hví Kærunevndin hevur tikið ta avgerð, hon hevur tikið. Hetta er eisini eitt hent amboð fyri umsitingina og skuldi uppá longri sikt gjørn, at avgerðirnar eru í tráð við tær avgerðir, ið Kærunevndin tekur.

Formaðurin í Kærunevndini hevur eisini sagt seg úr starvi. Hetta tí, at semja ikki fekst við landsstýrið um samsýningina. Landsstýrið hevur biðið Búskapar- og løgfrøðingafelagið skjóta nýggjan formann upp. Hetta er gjørt.

Sostatt skuldu hesi viðurskifti nú aftur verið komin í rættlag.

Við hesum metti eg, at eg havi svarað spurninginum so væl, sum svarast kann undir verandi umstøðum.

100-15 Loyvi til nærvarp í Føroyum

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Berg Jacobsen, landsstýrismann, frá Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

Nær ætlar landsstýrið at geva loyvi til nærvarp í Føroyum ?

Viðmerkingar:

Fyri 1,5 árum síðan reisti undirritaði spurning á tingi viðvíkjandi ætlan landsstýrisins um nærvarp her á landi. Í viðmerkingunum til fyrispurningin varð m.a. víst á ta demokratisering, sum tey seinru árini var farin fram á hesum øki í grannalondum okkara, har fleiri sokallaði nærvarp vóru farin at virka. Eisini varð víst á, at í fleiri ár høvdu einstaklingar og felagsskapir havt ætlanir um lokal- og nærvarp her á landi, og í tí sambandi sent landsstýrinum umsókn, tó uttan at nakað ítøkiligt var komið burtur úr.

Í svarinum til fyrispurningin varð m.a. sagt, at landsstýrið arbeiddi miðvíst við spurninginum, og at nevnd sat og arbeiddi við málinum. Víðari varð upplýst, "at allar umsóknir frá áhugaðum fyri nærvarpi ganga inn í arbeiðstilfarið hjá nevndini. Nevndin arbeiðir seriøst við

spurninginum um demokratisering á fjølmiðlaøkinum - og er medvitandi um tann týdning pressufrælsið hevur í einum demokratiskum samfelagi."

Loksins varð sagt frá, at nevndararbeiði skuldi verða liðugt á sumri 91, og kundi tá støða takast til eitt nú spurningin um nærvarp.

Eftir drúgt og gott arbeiði legði nevndin álit úr hondum í juni 1991. Viðvíkjandi spurninginum um nærvarp sæst í álitinum, at nevndin er samd um, at tað skal vera loyvt at senda nærútvarp og nærsjónvarp - og gevur hon hetta tilmæli við teirri grundgeving, at hetta fer at styrkja talifrælsið og við hesum eisini fólkaræðið. Nevndin mælir annars til, at byrjað verður við einari 2 ára royndartíð og at nærvarpingin eigur at verða skipað soleiðis, at sent kann vera á egnum sendineti til eitt geografiskt avmarkað øki (økisnærvarp). Harumframt eigur tað eisini at verða skipað so fyri, at tað skal verða møguligt at keypa avlopstíð á verandi sendinetum, sum ÚF og SVF brúka í dag, fyri kostpris (áhugavarp).

Nú tá nærum trý ár eru farin síðan nevndin kom við sínum tilmæli til landsstýrið loyvir undirritaði sær enn einaferð at reisa spurningin um nær politisk avgerð verður tikin og loyvi til nærvarp gerst veruleiki her á landi.

Við 22-0 atkvøðum varð 22. mars 1994 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast. Vegna samgonguslit varð fyrispurningurin tó ikki svaraður.

100-16 Heilsu- og sjúkrarøktarleiðslan innan Heilsuverk Føroya

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, frá Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið um at menna Heilsu- og sjúkrarøktarleiðsluna innan Heilsuverk Føroya, og nær kann roknast við, at møgulig ætlan verður sett í verk ?

Viðmerkingar:

Sambært "lov for Færøerne om sygehusvæsenet" § 3 verður m.a. sagt at "Den daglige administrative ledelse af sygehusvæsenet varetages af en af Færøernes landsstyre udnævnt direktør.."
Henda skipan er neyvari útgreinað í "Reglugerð fyri sjúkrahúsverk Føroya".

Somuleiðis er í reglugerðini tikin hædd fyri viðurskiftum umsjónarmanna, læknavirkseminum, sjúkrarøktini o.s.fr. Fyri nøkrum árum síðan varð annað embætið knýtt at sjúkrahússtjórastarvinum. Hetta varð gjørt, til tess at styrkja um fortreytirnar hjá sjúkrahússtjóraembætinum at taka støðu til spurningar/mál, sum viðvíkti tí læknaliga og/ella tí, sum beinleiðis ella óbeinleiðis viðvíkti tí viðgerðarliga.

Her var talan um at styrkja "læknaligu síðuna" innan umsitingina av sjúkrahúsverkinum.

Tá hugsað verður um, hvussu stórur partur av starvsfólkunum innan sjúkrahúsverkið eru røktarstarvsfólk og hvønn týðandi lut hesi hava í sambandi við heilsu- og sjúkrarøktina, so átti hesin bólkur, eisini at veri umboðaður í leiðsluni hjá sjúkrahússtjóraembætinum. Ikki minst í hesum døgum er hetta neyðugt, tá hugsað verður um broytingar í dagligum rakstri og hvørja ávirkan hetta hevur á gongdina innan sjúkrahúsverkið og hvørja ávirkan hetta í heila tikið hevur á ta heilsu- og sjúkrarøkt, sum vent verður sjúklingum og avvarðandi teirra.

Hevur tað verið neyðugt, at styrkja "ta læknaligu síðuna", so ivast undirritaði ikki í tí neyðuga og týdninginum av, at "heilsu- og sjúkrarøktar síðan" innan leiðsluna av sjúkrahúsverkinum verður styrkt.

Tá tað í spurninginum verður sagt "Heilsuverk Føroya", so verður hetta gjørt ásannandi, at tað sekundera økið innan Heilsuverkið - Sjúkrahúsverkið - hevur slagsíðu, tá tað snýr seg um "leiðslubygnaðin" og verður tí spurt hvørjar ætlanir landsstýrið hevur hesum viðvíkjandi.

Við 23-0 atkvøðum varð 22. mars 1994 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

28. apríl 1994 svaraði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður soleiðis:

SVAR

Í sjálvum fyrispurninginum verður leiðslan av Heilsuverki Føroya nevnd, meðan viðmerkingarnar allar snúgva seg um leiðsluna av Sjúkrahúsverki Føroya.

Heilsuverkið sum so fevnir um kommunulæknar, skúlalæknar, heimasjúkrasystrar, heilsusystrar, tannlæknar, apoteksverkið, sjúkrahúsverkið og landslæknan. Hesar nógvu skipanir eru ikki samskipaðar, og er leiðslan innan ymisku økini sera ymisk. Í frágreiðingini, sum Ráðgevingarbólkurin gav út seinasta heyst, varð mælt til eina umfevnandi samskipan. Eingin politisk støðutakan er enn til hesi tilmæli frá Ráðgevingarbólkinum.

Eg loyvi mær í svari mínum at ganga út frá, at spyrjarin spyr um leiðsluna innan Sjúkrahúsverk Føroya.

21. november 1989 varð á landsstýrisfundi samtykt, at yvirlæknin á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu verður læknastjóri sum partur av starvsøkinum hjá deildini.

Í setanarskjalinum verður sagt, at læknastjórin er varasjúkrahússtjóri og skal serliga taka sær av:
- **at** samskipa læknaliga arbeiðið sum heild,
- **at** samskipa sjúklingaviðgerðina.
- **at** meta um vaktarskipanina,
- **at** samráðast við yvirlæknarnar og skipa fyri samskifti teirra millum,
- **at** skipa fyri læknaligu útbúgvingunum.
- **at** vera talsmaður í læknaligum málum.

Tá skipanin hevur virkað eina tíð, gevur sjúkrahússtjórin landsstýrinum tilmæli um varandi skipan.

Hetta er ikki eitt starv, sum er normerað eftir vanligum reglum, t.v.s. við góðkenning frá fíggjarnevndini.

Henda endurskoðan av hesi skipan er - so vítt mær kunnugt - ongantíð gjørd, men hevur landsstýrið ætlan um at fáa hesa endurskoðan gjørda.

Sjálvur skilji eg væl, at røktarstarvsfólkini innan sjúkrahúsverkið eisini ynskja, at teirra fakligu áhugamál fáa ávirkan á sjúkrahússtjóraembætið.

Hetta var eisini samtykt at gera vart við á seinasta aðalfundi hjá Sjúkrasystrafelag Føroya.

Annars var ætlanin at hava eitt aðalorðaskifti um frágreiðingina frá Ráðgevingarbólkinum á tingi í vár. Hetta verður so av ongum, men kann frágreiðingin leggjast fyri tingið til umrøðu eftir ólavsøku.

Annars viðger uppskotið til nýggja stýrisskipan m.a. leiðsluviðurskifti, og kann hetta fáa ávirkan á framtíðar leiðslubygnaðin innan okkara sjúkrahúsverk.

Tá ið endurskoðanin av starvinum sum "læknastjóri" verður gjørd, vil ynskið frá røktarstarvsfólkunum viga tungt í málinum.

100-17 Setan av løgtingsins umboðsmanni

Ár 1994, friggjadagin 18. mars boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til løgmanns frá Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

Hvørji neyðug stig ætlar landsstýrið at taka til tess at fáa sett løgtingsins umboðsmann ?

Viðmerkingar:

Spurningurin viðvíkjandi "løgtingsins umboðsmanni" hevur mangan verið reistur á tingi.

Fyri umi. ári síðan varð soljóðandi uppskot frá einum meiriluta í rættarnevndini samtykt: "Álagt verður formannskapi løgtingsins at seta eitt fólk við góðum kunnleika til samfelags-, stats- og fólkarætt til at samskipa neyðugt lógartilfar fyri ein løgtingsins umboðsmann og at stovnseta starvið í hesum ári."

Uppskotið varð samtykt við 19-0 atkvøðum. Hetta var 12. mai 1993.

Á løgtingsins fíggjarlóg fyri 1994 eru játtaðar kr. 300.000 til endamálið.

Tá undirritaði metir tað av avgjørdum týdningi fyri rættartrygdini í hesum samfelagi og at tryggjað verður løgtinginum og borgarum landsins móti skeivum og tilvildarligum avgerðum, eigur ikki at drálast longur við at fáa ein løgtingsins umboðsmann settan.

Við 24-0 atkvøðum varð 22. mars 1994 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

28. april 1994 svaraði løgmaður soleiðis:

SVAR

Sum tað stendur í viðmerkingunum til fyrispurningin, so hevur meirilutin í rættarnevndini í løgtingsmáli nr. 197/1992 um løgtingsins umboðsmann samtykt: "Álagt verður formansskapi løgtingsins at seta eitt fólk við góðum kunnleika til samfelags-, stats- og fólkarætt til at samskipa neyðugt lógartilfar fyri ein løgtingsins umboðsmann, og at stovnseta starvið í hesum ári". Sostatt er tað løgtingið og ikki landsstýrið, ið sambært samtykt rættarnevndarinnar, skal taka stig til setan av umboðsmanninum.

100-18 Sparingar og bygnaðarbroytingar í avtaluni frá 12. oktober 1993 á heilsu-, skúla-, almanna- og samskiftisøkinum

Ár 1994, fríggjadagin 18. mars boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til løgmanns frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

Hvørjar eru sparingarnar og bygnaðarbroytingarnar ("strukturrationaliseringar") á heilsu-, skúla-, almanna- og samskiftisøkinum, sum landsstýrið við avtaluni frá 12. oktober 1993 hevur bundið seg til at fara undir, og hvussu koma hesar at ávirka føroyska samfelagið eftir landsstýrisins meting ?

Viðmerkingar:
Í avtalunum, gjørdar eru síðan 6. oktober 1992 við donsku stjórnina, hava landsstýri og løgting, sum hava samtykt at góðkenna avtalurnar, bundið seg til eina samanlegging av fiskavirkjunum á landi, samanlegging av bankunum, kvotuskipan fyri fiskiskap á Føroyagrunninum og mangt annað av sama slagi, sum mest av øllum minnir um ta samfelagsskipan, teir í áttatiárunum søgdu farvæl til eystan jarntjaldið í fyrrverandi kommunistisku londunum. Í teirri seinastu avtaluni við donsku stjórnina frá 12. oktober 1993 binda landsstýrið og tepri samgongumeirilutin á løgtingi, sum samtyktu hesa avtaluna við 17 atkvøðum, Føroya land til at fara undir bygnaðarbroytingar ("strukturrationaliseringer") og sokallaðar sparingar á heilsu, skúla-, almanna- og samskiftisøkinum frá fíggjarárinum 1995.

Við hesi avtaluni hevur samgongumeirilutin bundið eisini eitt komandi landsstýri, sum tekur við eftir løgtingsvalið seinni í ár, og er tað tí ikki av leið at spyrja løgmann, ið var føroyskur samráðingarleiðari, hvat ið liggur í orðinum bygnaðarbroytingar á heilsuøkinum. Er talan um tey 3 sjúkrahúsini, at tey eins og flakavirkini og bankarnir skulu leggjast uppaftur meir saman. Er við hesum orðunum ætlanin at avtaka tey bæði smáu sjúkrahúsini ella minka munandi um virksemi teirra, sum ráðleggingarnevnd í fjør skeyt upp, og hvørjar broytingar hevur landsstýrið annars hugsað sær á heilsuøkinum ?

Tað sama kann verða sagt um skúlaøkið. Er her talan um, at bygdarskúlar skulu halda uppat, og undirvísingin leggjast saman á teir størru skúlarnar, og hvør sparing er í hesum, tá ið saman um kemur. Hvussu ávirkar hetta bygdarlívið og samfelagið alt ?

Almannaøkið og samskiftisøkið verða eisini nevnd í avtaluni við donsku stjórnina. Hvat skal leggjast saman har og broytast í sjálvum bygnaðinum ? Er tað farleiðin hjá suðuroyingum, sum landsstýrið síðan hevur skotið upp at leggja um Sandoynna við minni skipi ? Ella farleiðin um Leirvíkartjørð fyri norðoyingar og Vestmannasund fyri Vágafólk ? Fólkið undrast, ilskast og spyr, hvat ið ætlanin er við hesum farleiðum, sum hvat ið teimum báðum seinastu viðvíkur geva stórt yvirskot í landskassan.

Fólk vænta eitt svar frá landsstýrinum.

Við 21-0 atkvøðum varð 22. mars 1994 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast. Vegna

samgonguslit varð fyrispurningurin tó ikki svaraður.

100-19 Skrásetingareftirlitið, p-talið v.m.

Ár 1994, friggjadagin 18. mars boðaði formaðurin frá umanfyristandandi fyrispurningi til løgmanns frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

Kann landsstýrið veita fulla trygd fyri, at almennu og privatu skrásetingarlógirnar verða hildnar og misnýtsla av p-talinum ajá fólki ikki fer fram?

Viðmerkingar:

Í tilverukreppu Føroya fólks í dag ræður eitt óhugnaligt máttloysi.

Tað er ein royndur lutur í søgu mannaættarinnar, at fær lógloysi fótin fyri seg í einum samfelagi, gongur tað til grundar.

Hetta er galdandi fyri allar tær fjøltáttaðu lógir, sum eitt lóggávuting smíðar.

Nú má politiska og umsitingarliga valdið í landinum koma burtur úr ábyrgdarloysinum yvir fyri landsins lógum, sum bæði dómur í Føroya rætti og landsrættinum lata okkum hóma.

Vísir politiski og umsitingarligi myndugleikin lógarábyrgd, so fer landsins borgari ikki bara at vísa áyrgd, men eisini at átaka sær tær skyldur, sum samfelagið krevur av honum.

Tá fer tann máttloysis andi, sum í dag valdar, skjótt at verða vendur til dirvi og treystleika at taka móti teim avbjóðingum, sum framtíðin heilt vist krevur av okkum øllum.

P-talið hevur upptikið meginpartin av fólkinum í fleiri ár.

Ein stórur bólkur av fólki, uttan iva við tilknýti til allar politiskar flokkar í løgtinginum, hevur síðan boð komu frá politiska myndugleikanum um at lata p-talið inn til peningar-

stovnarnar, saman við Bjørn á Heygum, advokati, kannað, um lógarheimild er hjá peningastovnunum at krevja undirskrift í sambandi við p-talið.

Føroya Sparikassi og Sjóvinnubankin góvu arbeiðsbólkinum rætt, at eingin lógarheimild er at krevja undirskrift.

Teir eru harmir um mistakið.

Vit vóna, at løgmaður við hesum veruleika á bordinum gevur peningastovnunum boð um at senda undirskriftirnar aftur til rætta viðkomandi.

Nýtsla av p-talinum í Føroyum eigur at vera avmarkað mest møguligt til lønar/skattgjald og innistandandi/peningaflytingar í peningastovnunum.

Tað veruliga álvarsmálið er skráseting, bæði almenn og privat sum so.

Óheppið er at samankoyra stovnar, men kann løgmaður veita trygd fyri, at ferðsluræstingurin í kunningarbókinum er í lagi, so t.d. at peningastovnarnir ikki kunnu fáa upplýsingar frá líkningarvaldinum.

Er ábyrgdin av allari almennari og privatari skráseting persónifiserað.

Hvørjar reglur hevur skrásetingareftirlitið at halda seg til, og hvussu virkar tað?

Átti Føroya Landsstýri ikki at tryggja landsins íbúgvar gjøgnum skrásetingareftirlitið, at peningastovnarnir fingu p-talið sambært Toll- og Skattalógina, heldur enn at fólk vórðu hótt við, at kontoin varð stongd, lótu tey ikki peningastovnunum p-talið.

Vónandi fær Føroya fólk gjøgnum løgtingið nøktandi svar um trygdina og tað etisk/moralsku mannagongdina í hesum álvarmáli.

Við 21-0 atkvøðum varð 22. mars 1994 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

28. apríl 1994 svaraði Signar á Brúnni, landsstýrismaður, vegna løgmann soleiðis:

SVAR

Í 1984 vórðu samtyktar løgtingslóg nr. 62 frá 5. juni 1984 um evnisskráir hjá almennum myndugleikum og løgtingslóg nr. 107 frá 15. november 1984 um privatar skráir v.m.

Sambært lógini um almennar skráir hevur Skrásetingareftirlitið eftirlit við hvørjari skrá, sum lógin fevnir um, og ansar eftir, at hesar verða nýttar í samsvari við lógina.

Sambært lógini um privatar skráir ansar Skrásetingareftirlitið somuleiðis eftir, at lógin ella reglurnar sambært henni verða hildnar.

Í fyrispurninginum verður spurt, um landsstýrið kann veita fulla trygd fyri, at lógirnar verða hildnar og misnýtsla av p-talinum hjá fólki ikki fer fram. Hetta kann landsstýrið sjálvandi ikki gera, og lógin hevur eisini ta fyritreyt, at brot kunnu verða gjørd á lógina, tí annars hevði ikki verið neyðugt við reglum um revsing.

Eftir forskriftunum hevur eigarin av skránni ábyrgdina av, at forskriftirnar verða hildnar, og verður brot framt á lógirnar, er heimild í báðum lógunum fyri at revsa brotini.

100-20 Uttanlandsskuldin

Ár 1994, mánadagin 21. mars boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrispuringi til Finnboga Ísakson, landsstýrismann, frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

Hvussu hugsar landsstýrið sær, at Føroyar kunnu gjalda aftur uttanlandsskuldina, sum nú fyri tað mesta er skuld til donsku stjórnina, og vil landsstýrið skjóta upp eina skipan viðvíkjandi rentunum, sum tyngja landskassan, tá ið næstu samráðingar verða við donsku stjórnina ?

Viðmerkingar:

Síðan tað eftir løgtingsvalið í 1988 kom fram, hvussu nógv størri ið uttanlandsskuld føroyinga var enn frammanundan sagt, er tað hent, at henda skuld at kalla øll somul er flutt frá at vera privat skuld yvir til at vera skuld hjá landskassanum.

Í 1988 var skuld landskassans í útlondum ikki meir enn 533 mió. kr.

Við árslok 1993 er skuld landskassans í útlondum sambært uppgerð frá Hagstovuni heilar 5.413 mió. kr. ella 5,4 miljardir kr.

Bara í 1993 vaks skuld landskassans í útlondum við 2.418 mió. kr. ella 2,4 miljardir kr. Samlaða uttanlandsskuldin er nú 7,5 miljardir kr.

Sostatt er næstan øll uttanlandsskuldin eftir trimum árum flutt yvir í landskassan.

Av tí sama hevur verið neyðugt at seta nógvan pening av á løgtingsfíggjarlógini til rentur.

Fyri 1994 er talan um heilar 551 mió. kr., ið settar eru av til rentur. Tað er bara almannamál, sum er hægri á løgtingsfíggjarlógini við 860 mió. kr.

Nógv tann mesta partin av føroysku uttanlandsskuldini hevur danski ríkiskassin tikið á seg við teimum 4 avtalunum, ið gjørdar eru millum landsstýrið og donsku stjórnina síðan 6. oktober 1992.

Eingin dugir at síggja, hvussu ið landsstýrið er ført fyri at gjalda hesa skuld.

Landskassin hevur eisini innlendiska skuld, sum við árslok 1993 var 800 mió. kr. og skyldar landskassin tí tilsamans 6,2 miljardir kr.

Um somu tíð, sum skuldin hjá landskassanum í útlondum er vaksin í stórum, er ognin hjá føroysku peningastovnunum í útlondum vaksin munandi. Í 1993 vaks nettoognin hjá peningastovnunum í útlondum sostatt við 1.929 mió. kr. Hetta er peningur, sum stendur í donskum peningastovnum og obligatiónum.

Útlendskir partacigarar í Føroya Banka staðfestu í 1992 og 1993 eitt tap upp á 666 mió. kr. Talan var um meira enn ein útlendskan partacigara í Føroya Banka. Samlaða uttanlandsskuldin hjá Føroyum er minkað m.a. við hesum sama tapstali.

Men hvussu skal tann stóra skuldin hjá landskassanum í útlondum minka ?

Hvussu verða vit førir fyri at gjalda bara rentumar av hesi stóru skuld, tá ið hetta skjótt verður tann størsta útreiðslan á løgtingsfíggjarlógini.

Við 19-0 atkvøðum varð 22. mars 1994 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast. Vegna samgonguslit varð fyrispurningurin tó ikki svaraður.

RED: 10 X



Nasjonalbiblioteket

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 22